Laksur hevur fingið stóran týdning fyri okkara útflutning. Prísirnir vóru høgir til februar mánað í ár, tá fóru prísirnir munandi niður. Hetta er ikki óvanligt orsakað av sæson fyribrigdum, og hevur marknaðurin gjørt vart við, at meira kundi fingist burtur úr figgjarliga, um fiskiskapurin var byrjaður fyrr og endaði tilsvarandi fyrr. Landsstýrið umhugsar henda spurning.

Alt samanumtikið eru framtíðarútlitini fyri sølu av okkara fiskavørum góð. Valutaviðurskiftini hava tó avgerandi týdning fyri figgjarliga úrslitið.

Saman um tikið, ber tó illa til at koma til annað úrslit, enn at heildarmyndin av gongdini í og støðuni hjá føroyska samfelagnum er døpur á at líta.

Yvir fyri útheiminum hevur føroyska samfelagið stórt og eftir øllum at døma, vaksandi hall.

Kann nevna, at vit tey seinastu trý árini hava keypt (innflutt) fyri næstan 800 milj. kr. meira enn vit hava selt (útflutt) fyri.

Okkara netto uttanlandsskuld (samlað skuld við frádrátti av tí vit hava til góðar) er í dag meira enn 1 milliard krónur.

Tað er óneyðugt hjá mær, at siga frá, at henda skuld skal gjaldast aftur. Og fyri at gjalda hana aftur, so skulu vit venda gongdini í Føroyum heilt avgerandi betra vegin. Vit skulu broyta eitt stórt árligt núverandi undirskot til eitt yvirskot í staðin.

Áðurnevndi innflutningur er í ovurstórum mun farin til almenna nýtslu, til privata nýtslu, til íløgur, sum ikki renta seg sjálvar og til beinleiðis óproduktivar íløgur.

Tað er tíverri ein sannroynd, at vit í dag standa við einari høvuðsvinnu, sum illa er før fyri at bera seg, sjálvt um hon fær árligt endurgjald frá tí almenna uppá meira enn 200 milj. kr.

Og framtíðarútlitini fyri hesa vinnu, sum er okkara altavgerandi innløgukelda, eru ikki alt ov ljós.

Vit verða trongdir burtur av fjarleiðum, og okkara høvuðsstovnar á heimaleiðum sigast ikki at vera nóg væl fyri.

Seinasta árið er hugurin til at gera nýggjar íløgur í okkara fiskiflota minkaður í stórum, samstundis sum hugurin hjá alt fleiri av teimum, sum eiga skip, er vaksin til at sleppa av við skip — her iroknað nøkur av okkara bestu.

Tær íløguætlanir, sum hóast alt koma fyri, ganga í stóran mun út uppá at útvega brúkt og eldri skip, av og á í sambandi við útflytan av frægastu skipum okkara.

Alt meðan hugurin til nýíløgur fellur og hugurin til at sleppa av við skip økist, so leita fleiri og fleiri av okkara bestu sjómonnum burtur í onnur lond at vinna.

Hatmiligt er, at okkara samfelag, sum nú er, ikki er ført fyri at útvega íbúgvum sínum dagligt starv.

Eg vil í hesum sambandi strika undir, at teir av okkara sjómonnum og onnur, sum vegna tørvandi yrkismøguleikar, leita burtur í vinnu, men hava fasta bústað sín her og soleiðis bera vinningin heim aftur til landa, teir eiga minst líka stóra tøkk uppiborna, sum vit aðrir, sum sleppa frá at leita burtur.

— — —

Nevndi í áðni, at vit skylda útlondum meira enn 1 milliard krónur netto. Hetta er ein munandi størri skuld uppá seg enn netto uttanlandsskuldin hjá okkara grannalondum.

Nettouttanlandsskuldin fevnir um samlaðu skuldina bæði á tí almenna og privata samfelagsøkinum.

Vøksturin í uttanlandsskuldini hevur verið ovurstórur seinastu árini, og hevur tað almenna ligið á odda í hesi lántøku.

Nevnast kann, at tað almenna fyrra hálvár í ár hevur upptikið lán uttanlands uppá minst 230 milj. kr., harav 73 milj. kr. til at gjalda falnar avdráttir, sum peningur ikki var til.

Samlaða uttanlandsskuldin hjá tí almenna var 1. januar 1981 meira enn 1 milliard krónur. Dregur ein ogn uttanlands frá, so er nettouttanlandsskuldin hjá tí almenna 890 milj. kr.

Kann eisini nevna, at hóast allar hesar lántøkur, so er likviditetsstøða landskassans so vánalig, at tað ikki hevur verið gjørligt at gjalda hvørjum sítt til tíðina. T.d. skyldar landskassin stórar upphæddir til Lønjavningargrunnin og Ráfiskagrunnin.

At likviditetsstøðan er vánalig kann ikki undra. At hon ikki er verri, enn hon er, hevur sína orsøk í, at stórur partur av tí peningi, sum figgjarlógirnar hava lagt av til

ávís endamál, men sum ikki eru framd, er farin til onnur endamál og soleiðis lætt um likviditetsstøðuna, men er so ikki tøkur peningur til tær tilætlaðu uppgávurnar.

Seinastu tvey árini er meirnýtslan í mun til fíggjarløgtingslógirnar minst 40 milj. kr. Fykafíggjarlógir verða lagdar fyri tingið í næstum. Herumframt vísir ein »likviditetsprognosa« fyri restina av fíggjarárinum, at aðrar útvið 40 milj. kr. koma at resta í. Og tá er ikki tikið við tað, sum átti at verið lagt til grunnarnar.

— — —

Kanska onkur heldur, at eg í míni lýsing av núverandi gongdini og støðuni eri heldur svartskygdur. Lat okkum vóna, at so er.

Men eitt er vist. Vit føroyingar standa í dag í eini støðu og yvirfyri trupulleikum, sum ikki verða loystir eftir einum degi ella tveimum.

Og teir verða ikki loystir uttan so, at vit øll hjálpa til.

Tað sum gerast skal, kann býtast upp í fimm høvuðslutir.

Fyri tað fyrsta mugu og skulu vit fremja tiltøk innan- og uttanfyri fiskivinnuna, sum skapa innløgur til okkara samfelag. Tiltøkini krevja í forhond stóran íløgur, meðan innløgurnar í besta fall koma nakað aftaná.

Tá vit so frammanundan bera uppá eina alt ov stóra uttanlandsskuld, og lítil og ongin peningur er í landinum, so er longu á íløgustiginum stórir vansar at vinna á.

Fyri tað næsta mugu og skulu vit spara. Vit skulu tálma í hvussu er vøkstrinum í almennu rakstrarútreiðslunum, og helst rakstrarútreiðslunum sjálvum.

Vit skulu tálma privatnýtsluni her á landi.

Vit skulu avmarka almennu íløgurnar. Tað er ein veruleiki, at vit ikki hava ráð til óavmarkaðar almennar íløgur til endamál, sum ikki eru tvingandi neyðug, íløgur, sum næstan altíð føra við sær vøkstur í almennu rakstrarútreiðslunum.

Vit skulu hava meira pening inn frá føroyska borgaranum. Hetta er neyðugt fyri at hava almenna »sektorin« gangandi, sum hann nú er útbygdur, herundir tær yvirføkur, sum framdar eru seinastu árini. Hetta er eisini neyðugt fyri at koma ájavnt og kunna gjalda millum annað ta yvirnýtslu, sum eg nevndi í áðni, tað likviditetshall, sum verður í inniverandi fíggjarári, og at byrja at gjalda inn í grunnarnar tað, sum sett er av til ávís endamál.

MEIRA INN FRÁ BORGARANUM

Høvuðsháttirnir eru álíkning av skatti, álegging av innflutningsgjøldum, av tolli og øðrum avgjøldum og gjøld fyri tænastuveitingar av ymiskum slagi.

Landsstýrið hevur higartil verið og ætlar at vera á varðhaldi yvir fyri almennum stovnum, tá talan er um at hækka gjøld fyri tænastur. Orsøkin er ynski um, at stovnarnir skulu spara og ynski um at sleppa borgarunum undan ov stórum vøkstri í livikostnaðinum. Í summum førum er tó neyðugt at loyva hækkanir, millum annað tá prisur á olju og vørum uttanífrá hækkar.

INNFLUTNINGSGJØLD OG ONNUR AVGJØLD

Meirinnkrevjingin fer fyrst og fremst at liggja í tolli og avgjøldum. Roynt verður at sleppa veruligum neyðsynjarvørum undan ov stórum hækkingum, og at lata tær vørur, sum ikki eru so neyðugar, bera hækkingina í tolli og avgjøldum. Roynt verður eisini, at lata vera við at leggja ov høgan toll og ov stór avgjøld á rávørur til íðnað, handverk v.m., og at sleppa rávørum og lutum til føroyskt framleiddar vørur til útflutnings undan tolli og avgjøldum. Alt hetta ger, at roknast má við munandi hækkingum á teimum vørum, sum ikki koma undir neyðsynjarvørur.

SKATTUR

Tað er ikki ætlanin at áleggja borgarunum hægri landsskatt, enn talan nú er um. Hareftirimóti verða royndir nú gjørdar at fáa tann skatt, sum álíknaður er, inn og helst til tíðina.

Viðurkennast má, at núverandi skattaskipan er ikki í lagi, serliga aftaná tær broytingar, sum framdar vóru herfyri.

Ein arbeiðsbólkur er nú settur, og landsstýrið ætlar at leggja fram fyri tingið uppskot til samtíðarskatting, sum helst skuldi komið at virka frá ársbyrjan 1983.

Tað er sum sagt ikki ætlanin at álikna borgaranum hægri skatt enn nú, men at tryggja eina rættvísari álíkning, og at tryggja at tann álíknaði skatturin kemur inn til landskassan í somu løtu, lønin verður útgoldin.

Á vinnuøkinum, har samtíðarskattaskipan ikki røkkur, er eisini ætlanin at gera broytingar við tí fyri eyga, at øll tann lønarinntøka, sum vinnulívsmaður tekur burtur úr vinnufyritøku, verður skattað beinan vegin sum samtíðarskattur. Eisini er ætlanin við skattaskipanini at eggja til at lata peningin standa í vinnuni, og tryggja, at vinningsbýtið og allur tann peningur annars, sum verður tikin úr vinnuvirki, verður skattaður fult út.

AVMARKAN AV ALMENNUM ÍLØGUM

Tvær høvuðsorsøkir eru til at ansa eftir á hesum øki. Deils hava vit ikki pening til fígging av íløgum, sum ikki eru strangt neyðugar. Deils føra almenna íløgur ofta við sær eina áhaldandi og stóra hækkan í almennu rakstrarútreiðslunum.

Í samband við samtyktina av fíggjarløgtingslógini fyri inniverandi ár varð avgjørt at steðga ætlaðu bergholsgerðunum til smáplássini, og at útseta ætlaðu útbyggingina av Skopunar havn.

Lat meg strika undir, at henda avgerð í sjálvari sær ikki var vend ímóti hesum ávísu plássunum. Vóru tilsvarandi ætlanir í øðrum plássum, vóru tær eisini steðgaðar ella útsettar.

TÁLMAN AV PRIVATU NÝTSLUNI

Sum nevnt verður tað neyðugt at krevja meira pening inn frá borgarunum, og førir hetta við sær eina ávísa tálman av privatu nýtsluni.

Herumframt er ætlanin at koma við serligum tiltøkum, sum eisini føra við sær minni privata nýtslu.

TILTØK INNAN OG UTTANFYRI FISKIVINNUNA

Nøkur dømi um hesi verða umrødd niðanfyri undir teimum ejnstøku økjunum.

FISKIVINNAN

Í ávísan mun havi eg longu umrøtt fiskivinnuna.

Sum nevnt verður stórt endurgjald latið úr landskassanum. Ynskiligt er heilt at sleppa undan hesi skipan, men er tað ikki gjørligt, sum nú er. Hinvegin verður arbeitt fram ímóti eini betri skipan fyri hesum endurgjaldi.

Sum nevnt í áðni, so tykjast høvuðsfiskastovnarnir ikki at vera so væl fyri.

Umhugsað hevur verið at seta veiðubann ávísar tíðir av árinum. Eftir upplýsingum frá Fiskirannsóknarstovuni og Fiskivinnuráðnum, verður hetta ikki sett í verk beint nú. Hinvegin er ætlanin at seta fram lógaruppskot um at geva Fiskirannsóknarstovuni heimild at steðga fiskiskapi á einum øki í avmarkaða tíð, har tað vísir seg, at veiddur fiskur er ov smáur.

Fyri at forða fyri, at veiðutrýstið á tosk og hýsu verður ov stórt, verður umhugsað at seta mark fyri, hvussu nógv trolararnir og partrolarar kunnu hava av toski og hýsu av samlaðu veiðuni.

Onnur tiltøk, sum kunnu koma upp á tal eru t.d. broyting í húkastøddum og meskaviddum og kvotering.

Arbeitt verður við einum uppbýti av okkara fiskigrunnum, sum kann gera tað lættari at leggja til rættis eina rímiliga og rætta røkt av okkara heimafiskiskapi.

Vit eru fleiri, sum halda tað vera rætt at steðga fiskiskapi sunnudag. Hetta samsvarar við arbeiðslag føroyinga, og minkar harafturat um veiðutrýstið.

Undir øllum umstøðum verður tað neyðugt at ansa væl eftir okkara fiskastovnum, serliga at verja tann smáa fiskin. Gera vit tað, skuldi út frá fyriliggjandi upplýsingum verið møguligt seinri at fingið større nøgdir upp úr heimasjógvi til eitt større virði.

Ætlanin er at stuðla nótabátunum, sum eru serliga illa fyri í ár, til at fiska svartkjaft. Eisini verður arbeitt við møguleikunum at bøta um hjá útróðrarbátunum.

Sum er fáa vit ov lítið virði upp úr okkara egna sjógvi. At tað er neyðugt at fremja tiltøk fyri at avmarka veiðuna eftir okkara høvuðsfiskastovnum, bøtir ikki um ta støðuna fyrstu tíðina, tvørtur ímóti, men skuldi gjørt tað, tá regulceringstiltøkini hava virkað.

Vit eiga at leggja doyðin á at kanna møguleikarnar at útnytta aðrar fiskastovnar í egnum sjógvi. Her verður serliga hugsað um svartkjaft.

Í føroyskum sjógvi er fiskaður nógvur svartkjaftur, og skuldu vit átt stóran lut av hesum stovni í okkara part. Vónandi verður samlaða veiðan av hesum stovni rímuliga avmarkað innan stutta tíð. Landsstýrið vil gera tað, sum møguligt er hesum viðvíkjandi. Umframt at fiska svartkjaft til ídnað, so hava royndir verið gjørdar at

virka svartkjaft til matna, bæði á landi (Bakkafrost) og umborð á skipi (Giljanes). Landsstýrinum kunnugt eru menn bjartskygdir út frá úrslitunum higartil, bæði viðvíkjandi fiskiskapi, tilvirking og sølumøgulcikum.

Áhugi er fyri at gera iløgur í hesa vinnu. So skjótt royndirnar vísa nóg haldgott prógv fyri vinnumøgulcikum á hesum øki, fer landsstýrið at stuðla víðari útbygging bæði á sjógvi og landi. Talan er um so stórar nøgdir, at eitt samlað gott úrslit viðvíkjandi framleiðslu og sølu av svartkjafti til matna kundi gjørt tað lættari at bygt uppaftur aðrar fiskastovnar og gjørt tað møguligt at komið burtur úr teimum trupulleikum, vit eru í.

Ein veiðugrein, sum kemur at geva trupulleikar í komandi tíð, er laksaveiðan, ikki tí at fiskiskapurin ikki er góður. Úrslitið er nakað betri í ár enn í fjør. Men ágangurin uttanífrá móti okkara laksaveiðu hevur verið sera harður, og harðnar í hvørjum. Beinleiðis at seta tiltøk í verk ímóti okkum fyri hesa veiðu, kann eftir øllum at døma koma uppá tal. Laksaspurningurin hevur ein sera týðandi leiklut, tá ið samráðst verður um fiskiveiðusáttmálarnar við EF og onnur grannalond. Til tess at lætta um samráðingartrýstið, verður neyðugt at seta munandi av laksasmolti út. Eisini er tað ein spurningur, um loyvi verður givið til teir smærru bátarnar at fiska laks á vetri. Hetta er neyvan forsvarligt.

Landskassin hevur longu í fleiri førum veðhildið fyri royndir at fiska í fyri okkum higartil fremmandum sjógvi. Úrslitini hava higartil ikki verið alt ov góð.

Kannað verður hvussu vit best leggja til rættis á hesum øki. Kann nevna at landsstýrið hevur boðað donsku stovnunum IFU og Danida til seminar í Tórshavn fyrst í september mánaði. Ætlanin er, at umboð fyri føroyskt vinnuliv skulu luttaka í hesum seminari.

ÍDNAÐUR

Fiskiídnaðurin má siggjast í samband við fiskivinnuna sjálva. Talan er um eitt stórt endurgjald frá tí almennna fyri at fáa hesi virksemi undir einum at bera seg.

Mett verður, at orkan innan flakavirkir er nóg stór í mun til ta rávøru, sum kann fáast. Áhugi er fyri øðrum fiskiídnaðarvirkjum, og er landsstýrið sinnað at stuðla so langt til ber.

Alt bendir á, at rætt hevði verið við einari størri frystigoymslu til nýtslu hjá føroyskum fiskavirkjum v.m. Ávís kommuna hevur bjóðað grundøki til slíka goymslu og er bílig orka tøk á staðnum.

Eitt stórt tal av ídnaðarvirkjum í vanligum týdningi eru stovnsett. Summi tiltøk siggja út til at hava livimøguleikar. Onnur sýnast ikki at hava livilíkindi, bóast menn vóru fúsir at investera, og lánistovnar v.fl. vildu stuðla.

Ætlan landsstýrisins er at stuðla skipabyggingini. Mannagongdin at forða fyri munandi innflutningi av fiskiskipum fer eisini at eggja monnum at byggja síni skip heima á landi, ið hvussu so er tey smærru skipini.

Ein ídnaðargrein, sum landsstýrið ætlar at stuðla, er framleiðsla av vindmyllum. Fyðsæð er, at vindmyllur sum slíkar ikki eru liðugt útviklaðar enn, men hetta verður

ivaleyst ein vøra, sum í framtíðini fær stóran týdning. Tí er tað rætt, at vit, ið hvussu so er í smáum, fylgja við í útviklinginum og soleiðis eru førir fyri at útbyggja, tá eftirspurningur og tekniskir møguleikar gera tað rætt.

Sum er kunnu øll sunn ídnaðartiltøk rokna við at fáa figgjan.

Landsstýrið metir, at verandi figgjarstovnar eiga at útbyggjast, og at aðrir figgingarstovnar verða stovnaðir til figgjan av virksemum, sum ikki kunnu fáa figgjan á verandi stovnum, t.d. fiskaalistøðir, smoltstøðir, pelsdjóraalistøðir o.s.fr.

Kannað verður, um vit kunnu fáa nakað av peningi til tílík endamál úr Nordiska Investeringsbanken.

Sum annars nevnt er ætlanin at lætta um toll og avgjøld á rávørum til ídnað, handverk v.m. og at sleppa rávørum til framleiðslu til útflutnings undan tolli og avgjøldum. Arbeitt verður við einum nýggjum býti av vørum innan tollreglurnar.

FISKAALING OG SMOLTFRAMLEIÐSLA V.M.

Ein av framtíðarinnløgumøguleikunum átti at verið aling av laksi, sílum, skeljadjórum v.m.

Vit hava nøkur fá royndarbrúk í gongd. Høvuðsorsøkin til, at fleiri ikki kunnu byrja, er tørvur á smolti.

Tað hevur ikki verið hildið ráðiligt at innflyta útlendskt smolt, og okkara egna smoltframleiðsla er alt ov lítil enn.

Stórur áhugi er fyri at gera íløgur í alistøðir og eisini er áhugi fyri at gera íløgur í smoltstøðir. Deils er p/f Fiskaaling í ferð við at byggja út. Deils eru privatir áhugaðir fyri tílíkum projektum. Landsstýrið hevur fingið til umhugsunnar projekt, sum kann framleiða 1 1/2 milj. smolt árliga.

Umframt til aling verður neyðugt at framleiða smolt at seta út, jbr. umrøðuna av laksafiskiskapinum.

Vit standa nærum á berum botni á hesum øki. Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar, og landsstýrið arbeiðir við at útvega figgjan til tílíkar íløgur.

PELSDJÓRAALING

Landsstýrið hevur samtykt at seta niður arbeiðsbólk til at kanna møguleikarnar á hesum øki. Ein verkfrøðingur hevur fyri landsstýrið gjørt eitt fyribils álit um pelsdjóraaling, og bendir hetta á, at møgulcikar eru fyri lønandi vinnu.

FARMASIGLING

Nógv hevur verið tosað um farmasigling sum alternativa vinnu.

Landsstýrið ivast ikki í, at her liggja møguleikar. Vit hava allar fortreytir fyri at røkja eina tílíka vinnu, ikki minst tá hugsað verður um okkara menn, sum í dag manna tann danska handilsflotan. Landsstýrið hevur longu lagt fyri tingið og fingið samtykt nýggjar reglur fyri figgjan av farmaskipum. Í dag hava føroyingar

nakrar av heimsins bestu figgjanarmøguleikum til bygging av nýggjum farmaskipum.

Sáttmáli er gjørdur um bygging av nøkrum skipum, og áhugi er fyri at gera fleiri.

Landsstýrið fer støðugt at fylgja við spurninginum og stuðla so frægt sum gjørligt.

LANDBÚNAÐUR

Játtaninar til landbúnaðin eru munandi hækkaðar, og verða ymisk tiltøk sett í verk fyri at bøta um úrtøkuna á hesum øki.

Til heystar verður farið undir at endurskoða jarðarlóggávuna og ta reglugerðina, jarðarráðið arbeiðir eftir.

STRANDFERDSLAN

Strandferðslan er sera kostnaðarmikil stovnur. Nakað er gjørt fyri at minka um útreiðslurnar á hesum øki. Munandi meira kann gerast og eigur at verða gjørt. Millumlandasiglingin hjá Strandferðsluni hevur samanumtikið givið ringar royndir og hevur kostað føroyska samfelagnum nógvan pening. Vetrarsiglingin er steðgað. Í sambandi við millumlandasiglingina er umsitingin hjá Strandferðsluni á landi økt í stórum. Ætlanin er at minka um hesa umsiting, serliga á ferðamannastovnøkinum.

BUSSRUTURNAR

Á hesum øki er ætlanin at minka um túratalið á verandi rutum og at nýta tað solciðis sparda til onnur pláss. Arbeitt verður við at finna bestu skipanina á hesum øki.

HELIKOPTARAFLÚGVINGIN

Royndarflúgvingin fer fram. Er úrslitið nóg gott, verður hildið á við flúgving alt árið. Smáplássini og útoyggjarnar fáa tá alt árið ferðasambund annanhvønn dag, og eina ferð um vikuna verður møguleiki at koma frá á morgni og heimaftur sama dag. Royndarflúgvingin verður gjørd av Mærsk Air og umsitin av Strandferðsluni. Framhaldandi flúgving ætlast røkt av P/F Flogsamband.

UTTANLANDSFLÚGVING

Landsstýrið kannar møguleikarnar fyri samarbeiði innan flúgving millum føroyingar og bretar. Eydnast at fáa tilika flúgving í lag, so verður arbeitt víðari fyri samarbeiði við aðrar. Føroysk luttøka í flúgvingini millum Danmark og Føroyar verður eisini viðgjørd.

VEGIR OG HAVNIR

Fyribils verður arbeitt víðari út frá teimum ætlanum, sum undanfarna løgting og

landsstýri høvdu lagt, tó við smærri játtanum.

Figgjarvánirnar gera tað neyðugt at halda aftur á hesum eins og á øðrum økjum.

Í samráð við bygdarráðið í Skopun er fyribils ein onnur loysn funnin viðvikjandi havnarlagnum har. Havnin verður gjørd djúpari, fundament til ferjulegu verður gjørt og portur sett fyri. Hvussu, ið viðari verður hildið fram, avhongur av úrslitinum av útbyggingini, sum nú fer fram.

ORKUMÁL

Teir støðugt hækkandi oljuprísirnir tyngja framvegis munandi um búskapin innan flestu øki í samfelagnum. Arbeitt verður við ætlanum um at minka um nýtsluna, lutvist við beinleiðis sparing og lutvist við umlegging til annan teknikk fyri at bøta um nýtsluúrtøkuna.

Í samvinnu við Orkuráðið fer landsstýrið at seta tiltøk í verk, sum miða ímóti, at minkast kann um innflutningin av olju.

Tær ætlaðu vatnnegisútbúgvingarnar hjá SEV í Vágum, Vestmanna og í Eysturoynni hava verið og eru framvegis til nágreiniligar kanningar hjá Orkuráðnum. Endaliga ummælið av samlaðu 10-ára byggiætlanini er væntandi um stutta tíð. Serfrøðingar eru í høvuðsheitunum samdir um at ráða til, at útbygt verður eftir teimum sjónarmiðum, ið ganga fram av útbyggingarætlanum SEV's, og landsstýrið fer at mæla til, at farið verður undir at fremja útbygging sum skjótast.

KOMMUNUMÁL

Fleiri av teimum føroysku kommununum eru ikki serliga væl fyri figgjarliga.

Ætlanin er at broyta býtið av inntøkum og ábyrgd millum land og kommunu. Endamálið er at gera kommununurnar meira sjálvstøðugar.

Landsstýrið arbeiðir við spurninginum um studning frá ríkinum til havnabygging. Ein loysn á hesum øki vildi lætt munandi um hjá fleiri kommununum.

POSTVERK FØROYA

Roknað verður við, at Postverk Føroya í verandi ári hevur eitt hall uppá 5 til 6 milj. kr.

Postverkið hevur heitt á landsstýrið um loyvi til at hækka postgjøldini. Landsstýrið metir, sum áður sagt, at vit eiga at verða varnir við at loyva hækkanir av gjøldum fyri almennar tænastur.

TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS

Eisini telefonverkið hevur hall í ár uppá 2 3 milj. kr. Nýggja automatstøðin í Tórshavn er sett til. Hetta fer væntandi at bøta munandi um telefonviðurskiftini og væntandi eisini um rakstrarúrslitið.

SKÚLAMÁL

Byggingin av deild av Føroya Handilsskúla í Havn verður boðin út og kann byrjast í heyst.

Tá ið handilsskúlin er liðugur, er ætlanin at fara undir bygging av maskinskúlanum.

Nevnd er sett at endurskoða og nútímansgera lærlingalógina.

Lógaruppskot um nýggjan studentaskúla í Eysturoy verður greitt at leggja fyri tingið í næstum.

Landsstýrið fer at leggja serligan dent á at útbyggja útbúgvingina hjá teimum 16-19 ára gomlu.

HEILSUMÁL

Álit um útbygging av føroyska sjúkrahúsverkinum frá ráðleggingarnevndini fyri Sjúkrahúsverk Føroya verður lagt fyri tingið í næstum.

Tann primera heilsutænastan verður útbygd.

ALMANNAMÁL

Á hesum øki fer ein framhaldandi útbygging fram. Eins og fyri skúlamál, heilsumál og onnur mál verður vist til skjølini í notatformi, har meira nágreiniliga er greitt frá.

HÚSALÁNSGRUNNURIN

Ætlanin er at broyta reglurnar fyri útlán grunnsins í hesi tingsetuni. Endamálið er at veita meira rímilig lán og samstundis at fáa peningin skjótari inn aftur í grunnin. Tó er ætlanin ikki at økja um rentur og avgjøld av lánum úr Húsalánsgrunninum tey fyrstu árini av avdráttartíðini. Ætlanin er eisini at eggja til byggjan av smáum raðhúsum og/ella íbúðum.

MENTAMÁL

Hóast vánaligar fíggjarvánir er ætlanin at veita størst møguligan stuðul á hesum øki.

FØROYAHÚSIÐ

Leingi hevur verið tosað um at útvega føroyskum útisetum í Keypmannahavn hóskandi høli at búleikast í.

Landsstýrið og fíggjarnevnd hava samtykt, at landskassin letur pening til húsaleigu, ljós og hita til eitt ávist leigumál.

Ætlanin er, at hetta tiltak skal rekast á sama hátt, sum tað ætlaða Føroyahúsið, inntil hetta einaferð kemur upp at standa.

UMSITINGARMÁL

Landsstýrið og umsitingin hava vánalig og trong høli at húsast í. Fíggjarviðurskiftini gera tað ógjørligt at byggja tann nýmótans bygning til endamálið, sum einaferð má koma.

Fyri møguliga at hjálpa upp á støðuna verður umhugsað at byggja omaná Sjóbúðargrundina úti í Tinganesi.

Landsstýrið hevur sett seg í samband við býarark itektin og biðið hann kanna møguleikarnar fyri, at hesin bygningur verður bygdur soleiðis, at hann fyrst verður nýttur til skrivstovuhølir, og seinni til løgtingssal, nevniliga tá nýggjur umsitingarbygningur verður bygdur.

Hetta hevði gjørt tað møguligt einaferð fram í tíðina at flutt Føroya Løgting út aftur í Tinganes.

— — —

Eg havi roynt í stuttum at meta um gongdina í okkara samfelag, um støðuna vit eru í, og sagt frá nøkrum av teimum tiltøkum, sum landsstýrið kundi hugsað sær at sett í verk. Sjálvandi kundi nógv verið lagt aftur at. Ivaleyst kemur nógv, eisini nógv annað, fram undir viðgerðini av hesi røðu.

Eg vil eina ferð enn minna á, at okkara trupulleikar, sum eg meti vera sera stórar, ikki verða loystir, uttan at allir føroyingar leggja rygg til.

Ofta hevur verið sagt av monnum, at vit føroyingar kunnu ikki loyva okkum at taka ímóti ti endurgjaldi, sum danski staturin letur til gjald av felagsøkjum. Tað skal vera inannminkandi. Her kunnu meiningarnar vera ymiskar.

Men eitt máttu vit øll kunna blivið samd um. Vit kunnu ikki loyva okkum bæði at hava metútflutning uppá meira enn 1 miljard krónur og at fáa statsstuðul uppá 400 milj. kr. og kortini hava eitt risastórt undirskot tá avtornar. Hetta hendi í fjør. Nakað líknandi hendi fyrra árið, og úrslitið í ár verður ikki nógv annarleiðis.

Hetta er mannminkandi fyri okkum sum tjóð.

Teir gomlu høvdu ikki ypt økst og latið staðið til. Teir høvdu í staðin smoygt upp um armar og samstundis sett nýtsluna niður. Teir dugdu at laga seg. Teir kláraðu seg undir skiftandi umstøðum.

Her er talan um høvuðsstøðutakan, ella tað sum danir kalla »holdning«.

Føroyar og føroyingar hava fyrr staðið yvir fyri trupulleikum. So stórum trupulleikum, at menn ivaðust í, um hesir kundu loysast. Høvuðsstøðutakan føroyinga førdi við sær, at trupulleikarnir vórðu loystir.

Vit eru førir fyri at loysa okkara trupulleikar, um vit vilja — um vit eru tilreiðar at viðurkenna støðuna, sum hon er, og taka avleiðingarnar av hesi støðu.

Sitandi samgonga og nýggja landsstýrið hava virkað eitt hálvt ár. Eitt rímiligt innkoyringstíðarskeið.

Vit hava havt ávísar trupulleikar, serliga í byrjanini, ikki orsakað av ágangi frá andstøðuni, men orsakað av teimum tillagingarspurningum, sum heilt náttúrliga stinga seg upp í byrjanini av einum samarbeiði.

Til andstøðuna vil eg loyva mær at siga. Vit ganga út frá, at til, tá tit fáa føturnar fyri tykkum, fara at virka sum andstøða. Og tað hava tit fullan rættin til. Tit hava enntá skyldu til tað.

Til samgonguna vil eg loyva mær at siga. Vit 17 løgtingsmenn samráddust og saindust um at reka ein ábyrgdarpolitikk. Skulu vit náa hetta mál, so er neyðugt, at allir 17 eru tilreiðar, deils at bera skatta- og tollbyrðar, sparitiltøk og onnur tiltøk saman við restini av okkara fólki, men samniliga eisini at bera tær politisku byrðar, sum standast av at áleggja okkara egnu hesar somu byrðar.

At enda vil eg einaferð enn ynskja gott samarbeiði millum landsstýri og løgting — bæði samgongu og andstøðu.

Sí skjal 2.

---

1. Skipan av fiskiveiðuni eftir botnfiski á landleiðini

Ár 1981, fríggjadagin 31. juli legði Petur Reinert, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um skipan av fiskiveiðuni eftir botnfiski á landleiðini.

§ *1.* Royndin eftir botnfiski á landleiðini í 1981 og 1982 verður ikki størri enn í 1980.

§ *2.* Veiða við troli verður loyvd uttan fyri 18 fjórðinga linjuna á beinum grundlinjum.

§ *3.* Ávísar leiðir uttan fyri 18 fjórðinga linjuna kunnu verða friðaðar fyri trol ávísar tíðir av árinum. Føroya banki verður friðaður fyri trolveiðu alt árið.

§ *4.* Minsta meskavídd á troli verður 155 mm aftastu 8 metrarnar av trolinum. Trol kunnu góðkennast av vaktar- og bjargingartænastuni, tá ið tey fara um borð.

§ *5.* Allar gýtingarleiðir verða friðaðar fyri garnaveiðu.

§ *6.* Veiða við dekksførum verður loyvd uttan fyri 6 fjórðingar úr landi.

§ *7.* Ikki er loyvt at landa tosk undir 55

cm, hýsu undir 42 cm, upsa undir 55 cm og kongafisk undir 35 cm.

§ *8.* Troling eftir flatfiski og royndarfiskiskapur við troli annars fyriskipað av fiskirannsóknarstovuni kunnu verða loyvd eisini innan fyri 18 fjórðinga markið.

§ 9. Landsstýrið setir í reglugerð gjøllari reglur um útinning lógarinnar, har í millum slíkar reglur, at avmarkingin sbrt. § 1 verður hildin, og eftir tilmæli frá fiskirannsóknarstovuni reglur, ið tilskila tær trollfríu leiðirnar sbrt. § 3 og gýtingarleiðirnar sbrt. § 5.

§ *10.* Brot móti hesi lóg og tilhoyrandi reglugerðum verða sektað við bót og við tøku av veiðu og reiðskapi.

§ *11.* Henda lóg kemur í gildi 1. september 1981. Sama dag fara lógir og reglugerðir, ið stríða ímóti hesi lóg úr gildi.
2. *stk.* Eftir tilmæli frá fiskirannsóknarstovuni verður lógin endurskoðað í ólavsøkutingsetuni 1982.

Viðmerkingar:

Ársveiðan av botnfiski undan Føroyum hevur seinastu árini bert verið eini 80.000 tons, og kemur hetta fyri stóran part av niðurfiskaðum stovnum.

Góð ár nakað herfyri var veiðan umleið eini 140.000 tons um árið.

Eingin ivast longur í, at við skynsamari roynd hevði borið til at fiska 135 145.000 tons av botnfiski um árið — ella kanska uppaftur meira — um stovnarnir komu á fulla hædd og kundu givið sum mest.

Og møguligt er at fáa stovnarnar aftur á fulla hædd um eini 6 - 8 ár.

Ein meirfiskiskapur uppá umleið 70.000 tons av ráfiski um árið vildi í mun til nú við dagsins prísum givið umleið 500 milj. kr. eyka í søluvirði.

Fyri at náa hetta mál, at fiskastovnarnir koma at geva sum mest, verður neyðugt í mest møguligan mun at friða ungfiskin, so hann verður gýtingarførur, áðrenn

haun verður veiddur. Avgerandi er at veiðutrýstið — fiskiorkan ella skipatalið — ikki veksur, men stendur við. Fyriliggjandi uppskot ber í sær, at ársveiðan av toski, hýsu og upsa minkar fyrsta árið. Tað er ti heilt órimiligt, at vit einsamallir í eini neyðugari uppbyggingartíð skulu bera hetta tap, og má ti fremmandur fiskiskapur eftir botnfiski á Føroya leiðini minka niður í einki ella heilt halda uppat.

Tingið viðtók í vár, at bera so í bandi, at niðurfiskaðu fiskastovnarnir vórðu endurreistir og at skipa so fyri við skynsamari veiðu av øllum botnfiskasløgum, at tey kundu givið sum mest til landshúsarhaldið.

Í samljóði við hesa viðtøku setir tjóðveldisflokkurin hetta uppskot fram.

1. viðgerð 31. august. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 23. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 31. juli 1981 og við fyrstu viðgerð 31. august beint í fiskivinnunevndina.

Hetta lógaruppskotið gongur út upp á ymiskar broytingar í verandi fyriskipan í fiskiskapinum eftir botnfiski við Føroyar.

Eftir skrivligari áheitan frá Klaksvíkar útróðrarfelag, hevur hetta felag havt fund við fiskivinnunevndina um uppskotið.

Millum annað:

1. At veiðitrýstið ikki veksur upp um tað, tað var í 1980.
2. At fiska við troli verður loyvt uttan fyri 18 fjórðingar.
3. At ávísar leiðir uttan fyri 18 fjórðingar kunnu verða friðaðar fyri trol ávísar tíðir.
4. At Føroya Banki verður friðaður fyri trolveiðu alt árið.
5. At minsta meskavídd í troli verður 155 mm.
6. At allar toskagýtingarleiðir verða friðaðar fyri garnaveiðu.
7. At deksfiskiførunum verður forboðið at fiska innan fyri 6 fjórðingar úr landi.
8. At ikki verður loyvt at landa tosk undir 55 cm, hýsu undir 42 cm, upsa undir 55 cm og kongafisk undir 35 cm.
9. At troling eftir flatfiski og royndarfiskiskapur við troli fyriskipað av fiskirannsóknarstovuni kann verða loyvd alla staðir.

Ein meiriluti (Fredrik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Tórálvur Mohr Olsen, Juul Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Jógvan Olsen) førir fram at tað illa kann lata seg gera, so í bræði at seta so vittgangandi reglur um skipan av fiskiskapinum eftir botnfiski.

Hetta fær avleiðingar fyri okkum í sambond við fiskiveiðuavtalur við onnur lond.

Hetta fær eisini avleiðingar fyri tað fiskimynstur, sum fiskifloti okkara nú er útbygdur uppá, og hetta tekur lívsgrundarlagið undan tí staðbundna útróðrinum við smærri deksførum. Meirilutin kann als ikki taka undir við tí, at deksførum ikki verður loyvt at fiska innan fyri 6 fjórðingar úr landi, og at tað t.d. ikki skal vera loyvt at landa tosk undir 55 cm og hýsu undir 42 cm. Meirilutin kann sostatt ikki taka undir við uppskotinum, vitandi um at landsstýrið hevur heitt á fiskivinnuráðið um at gera eitt uppskot um fiskiveiðumynstrið eftir botnfiski sum heild, og mælir tí til, at eitt eintak av hesum máli, álit og brævi frá Klaksvíkar útróðrarfelag verður sent teimum til at hava við í ráðsins metingum til uppskot og setir fram hetta

UPPSKOT
TIL
samtyktar

Eitt eintak av málinum, álitinum og brævinum frá Klaksvíkar útróðrarfelag verða send Fiskivinnuráðnum.

Ein minniluti (Hans Marius Joensen) metir, at uppskot landsstýrisins, løgtingsmál nr. 146/1981: Fiskiveiði á landleiðini innibera tey friðingartiltøk, sum §§ 6 og 7 í uppskoti tjóðveldisfloksins, løgtingsmál nr. 1, vildi havt. Minnilutin mælir tí løgtinginum til at samtykkja uppskot tjóðveldisfloksins, løgtingsmál nr. 1 soleiðis broytt. Tá málið varð framlagt á ólavsøku, boðaði tjóðveldisflokkurin frá, at flokkurin altið er til reiðar at viðgera og møguliga broyta upprunauppskotið, og setir tí fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

1) Í § 2 verða »18 fjórðingar« broytt til: »16 fjórðingar«.
2) Í § 3 verða »18 fjórðingar« broytt til: »16 fjórðingar«.
3) §§ 6 og 7 ganga út.
4) §§ 8, 9, 10 og 11 verða ávikavist §§ 6, 7, 8 og 9.

1) I § 2 ændres »18 sømil« til: »16 sømil«.
2) I § 3 ændres »18 sømil« til: »16 sømil«.
3) §§ 6 og 7 udgår.
4) §§ 8, 9 10 og 11 bliver henholdsvis §§ 6, 7, 8 og 9.

2. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot frá minniluta í nevndini fall við 5-0. Lógaruppskotið fall við 5-0. Uppskotið til samtyktar frá meirluta í nevndini samtykt við 22-0.

F.L.j.nr. 1500-1-7-3.

2. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann

Ár 1981, friggjadagin 31. juli boðaði løgtingsformaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Jákupi Lindenskov, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Vil landsstýrið bers so í bandi, at hjálpimiðlastøð fyri brekað kemur at gerast veruleiki, so sum upprunaliga ætlað, og at hetta verður at henda í allheims ári teirra brekaðu 1981?

Viðmerkingar:

Í 1976 varð peningur settur á fíggjarætlanina hjá landssjúkrahúsinum til eina hjálpimiðlastøð.

Peningurin skuldi brúkast til at stovnseta hjálpistøð fyri brekað, so at tey lættari kunnu fáa fatur á ymsum hjálpitólum, sum tørva, t.d. sengur, lyftir, stólar, telefonskivur, skaffigreiðir o.t. Samstundis skuldi vegleiðing í brúkinum og kunning um tey ymsu stuðulsamboðini eisini fáast.

Rættiliga skjótt vóru høli fingin og samstarvsavtalur skrivaðar. Samstarvstrupulleikar tóku seg tó upp, og enn liggur hetta sum køvandi kleppur fyri málinum.

Í september verður høvi á Keypsstevnuni, sum verður í Íbróttarhøllini í Havn at síggja hjálpiamboð til brekað. Hetta fer sjálvsagt at stuðla til, at vit gerast meiri medvitandi um hesar neyðugu hjálpilutir hjá teimum, sum krevja eitthvørt stuðulsamboð.

Nú vit eru í seinra helmingi av alheims handikapárinum — ári teirra brekaðu — hevði verið hóskiligt, at hetta tilboð um eina amboðsstøð gjørdist veruleiki.

Í dag skal hin brekaði mangan kamossagongdina fyri at finna hjálpitólið, og tí er at vóna, at málið finnur eina loysn.

31. august var við 29-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

7. september svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyri spurninginum soleiðis:

SVAR

Tann 20. december 1976 setti landsstýrið eina arbeiðsnevnd, ið skuldi seta fram uppskot til landsstýrið um skipan av hjálpiamboðsmiðstøð.

Fundir vórðu hildnir 12. august, 3. oktober og 21. november 1977, men einki álit spurdist burtur úr hesum.

Í dag er ein skipan soleiðis, at sjúkrahúsini útflýggja hjálpartól sambært »Indenrigsministeriets cirkulære af 20. februar 1975 om afgrænsninger af behandlingsredskaber, hvortil udgiften afholdes af sygehusvæsenet«, og er hetta eisini galdandi fyri sjúkrahúsini í Føroyum.

Eisini verða tól v.m. játtað av Færøernes Ulykkesforsikring.

Hóast hetta, er tað neyðugt við eini hjálpiamboðsstøð, hvar ein skráseting av tólum fer fram, og hvar serkøn arbeiðsmegi kann vegleiða brekað fólk í nýtslu teirra av tólum v.m. Tí er svarið játtandi fyri fyrra part av spurninginum.

Annar spurningurin snýr seg um ein miðstøð kann koma at virka í hesum árinum.

Hetta er treytað av, í fyrsta lagi, at ávist høli er til taks, og í øðrum lagi, um ein normering av starvi fæst.

Landsstýrið er sinnað at seta eina hjálpiamboðsstøð í verk sum skjótast, og um tað letur seg gera, so í hesum árinum.

3. Broyting í myndingalógini og rættargangslógini

Ár 1981, friggjadagin 31. juli legði Jákup Lindenskov, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at seta í gildi fyri Føroyar ríkislóg nr. 257 frá 4. juni 1969 § 1, nr. 2 og lóg nr. 244 frá 8. juni 1978 »om ændring af myndighedsloven og retsplejeloven«.

Viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um foreldramyndugleika v.m. yvir børnum uttanfyri hjúnarlag.

Tað má haldast at vera órimiligt, at rætturin til børn uttanfyri hjúnarlag — rættur foreldra til børn teirra og til at vera saman við teimum í førum, har børn og foreldur hava lívað saman — og foreldrini síðan eru farin hvør frá øðrum — skal ikki vera hin sami, sum tað er úr einum hjúnalagi.

Eftir galdandi lóg fyri Føroyar hevur bert mamman foreldramyndugleikan til barnið/børnini, tá samlivið hevur verið pappirsleyst.

Pápin hevur heldur ongan lógtryggjaðan rætt til barn sítt ella til at kunna vera saman við sínum barni/børnum í førum, har pappir um samlív treyt — og hetta samlív er uppathildið.

Uppskotið javnsetir ikki »pappirsleyst hjúnalag« við vanligt hjúnalag, men tað vil gera tað møguligt hjá pápanum at fáa rætt til at vera saman við barni sínum á sama hátt, sum tað er úr fráskildum hjúnalagi.

Foreldramyndugleikin yvir børnum uttan fyri hjúnarlag liggur framvegis (sambært uppskotið) hjá mammuni, men uppskotið ger tað møguligt við dómi, at pápin kann fáa foreldramyndugleikan, um tað verður hildið fremjandi fyri barnið, t.d. um mamman verður hildin ikki at vera før fyri at hava barn sítt.

Pápin kann sambært uppskotið haraftrat fáa foreldramyndugleikan, um móðirin ætlar at burturadoptera barnið. Um mamman doyr, áðrenn barnið er komið til myndugleikaraaldur, kann pápin somuleiðis fáa foreldramyndugleikan, um hetta er til frama fyri barnið.

1. viðgerð 31. august. Málið varð beint til landsstýrið.

4. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann

Ár 1981, friggjadagin 31. juli boðaði løgtingsformaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Vilhelm Johannesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hevur landsstýrið nakra ætlan um at gera helikoptaralandingarpláss á Kirkju á Fugloynni.

Viðmerkingar:

Undir seinasta landsstýri varð arbeitt við eini ætlan um at gera helikoptaralandingarpláss við tey trý sjúkrahúsini og á útoyggjunum.

Høvuðsendamálið við hesi ætlan var at bøta um møguleikarnar fyri at flyta sjúklingar loftvegis av útoyggjunum til sjúkrahúsini og at bøta um møguleikarnar fyri helikoptaraflutningi í teimum førum, tá onnur samferðsla var tarnað av brimi.

Sitandi landsstýri er nú farið undir royndarflúgving við helikoptara. Í hesum sambandi eru landingarpláss gjørd á fleiri smáplássum og á útoyggjunum. Á Fugloynni er einans eitt helikoptaralandingarpláss gjørt. Hetta er lagt í Hattarvík.

Hetta vit siga, at helikopturin, sum nú verður nýttur, ikki kann lenda á Kirkju. Tað eru fimm kn. millum bygdirnar og leiðin liggur upp um oynna. Hetta vil siga, at í teim førum, tá ein sjúklingur skal flytast av Kirkju, og hetta ikki letur seg gera sjóvegis, so skal hann fyrst berast teir fimm kilometrarnar um oynna til Hattarvikar.

Fugloyggin verður ikki tryggjað í sama mun sum aðrar oyggjar, uttan so, at tvey helikoptaralandingarpláss verða í oynni. Eitt í Hattarvík og eitt á Kirkju.

31. august var við 29-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

8. september svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Landsstýrið hevur sett Tyrlu í royndarflúgving í 3 mánaðir í ár til flestu smáplássini í Føroyum.

Finaferð í september mánaða verður støða tikin til, um henda royndarflúgving førir til, at tað verður flogið í vetur eisini.

Verður afgjørt, at helikoptaraflúgvingin skal halda fram, verður flogið til øll tey pláss, sum ikki hava gott samband á annan hátt við meginøkið. Tá skulu eisini lendingarpláss gerast betur, og tá verður eisini gjørt klárt til at flúgva til Kirkju.

Annars kann upplýsast, at tilfar um helikoptaravallir hevur ligið klárt síðani 1974, so lendingarpláss kundu verið klár fyri góðari tíð síðani.

---

5. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann

Ár 1981, fríggjadagin 31. juli boðaði løgtingsformaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jóannes Dalsgaard, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hvørji stig hevur landsstýrið tikið ella hvørji stig ætlar landsstýrið at taka, fyri at útvega tí nógva ungdómi innivist, sum kemur av bygd til Havnar at søkja sær útbúgving?

Viðmerkingar:

Hóast útbúgvingarmøguleikarnir uttan fyri høvuðsstaðin eru batnaðir tey seinastu árini, er tað ein royndur lutur, at ein stórur partur av føroyska ungdóminum framvegis leitar sær til Havnar at ganga í skúla ella fyri at fara í læru.

Henda gongd má metast at fara at halda fram so leingi, sum tey flestu teoretisku og praktisku útbúgvingartilboðini eru at finna í Tórshavn.

Samstundis má tað ásannast, at henda gongd hevur ført til, at tað gerst alt torførari hjá teimum, sum koma av bygd til Havnar at søkja sær útbúgving, at finna nakað sámuligt at búgva í til ein rímuligan prís.

Hetta, at skúlaungdómurin í Havn hevur bústaðartrupulleikar, er í sjálvum sær eingki nýtt, men hesin spurningur er vorðin meira átrokandi, nú skúlamyndugleikarnir hava avgjørt at byggja ein part av kostdeildini í Hoydølum um til skúlastovur. Henda avgerð ger, at tað verða 22 búpláss færri á kostdeildini komandi skúlaár, um ikki onkur útvegur verður funnin.

Sum kunnugt er í hesum spurningi ikki bert talan um næmingar í Hoydølum. Umframt teir eru mong onnur ung komin av bygd til Havnar at læra. Hugsað verður her um lærlingar, handilsskúlanæmingar, sjómansskúlanæmingar og læraraskúlanæmingar fyri nú at nevna teir størstu bólkarnar. Hesi munnu vera eini 500 í tali eftir hvat lærustovnar og myndugleikar upplýsa (lágt mett). Til hesi umleið 500 fólkini eru ca. 125 búpláss til taks í samband við sjálvar lærustovnarnar. Upp í hesi 125 plássini eru roknað tey pláss á Skúlaheiminum, sum verða nýtt av øðrum enn dagskúlalærlingum av bygd.

Hesi mongu ungfólk av bygd, sum omanfyri eru nevnd, eru sostatt í stóran mun víst til sjálv at finna sær tak yvir høvdið, tá tey flyta til Havnar. Hetta vil í flestu førum siga, at tey noyðast út á tann privata íbúðarmarknaðin. Í mongum førum eydnast tað teimum at finna eitt gott og hóskiligt kamar hjá góðum fólkum, men ofta eru tey óheppin og verða noydd at taka av bæði vánaligum og dýrum tilboðum.

Tað eigur eisini at verða havt í huga, at møguleikarnir at keypa sær heilsugóðan mat til ein yvirkomiligan pris heldur ikki eru teir bestu í Havn í løtuni.

Niðurstøðan av hesum má, eftir mínum tykki, verða tann, at tað almenna, sum jú hevur høvuðsábyrgdina av, at tey flestu læruplássini liggja í Havn, má átaka sær ábyrgdina fyri at hýsa ti avbygdaungdómi, sum søkir til hesi lærupláss.

Út frá hesum viðmerkingum loyvi eg mær tí at seta landsstýrismanninum í sosialum- og útbúgvingarmálum hendan fyrispurning.

31. august var við 29-0 atkvøðum samtykt, at Eilif Samuelsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

8. september svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Spurningurin var soljóðandi:

»Hvørji stig hevur landsstýrið tikið ella hvørji stig ætlar landsstýrið at taka fyri at útvega tí nógva ungdómi innivist, sum kemur av bygd til Havnar at søkja sær útbúgving?«

Sum kunnugt var í ár fyri aðru ferð neyðugt at finna eina bráðfeingis loysn á hølisviðurskiftunum á Studentaskúlanum í Hoydølum. Til tess at útvega nóg mikið av skúlastovum varð miðhæddin á kostdeildini gjørd um til 7 skúlastovur, men harvið minkaði talið á búplássum hjá kostnæmingunum við 22.

Samstundis, sum landsstýrið samtykti hesa umbygging, varð eisini samtykt at gera aðra av læraraíbúðunum á loftshæddini um til búrúm fyri 8 næmingum.

Landsstýrið hevur eisini samtykt, at tey húsini, sum landið eigur á Hoydalsvegi 1

skulu nýtast til búrúm. Eftir eina minni umbygging, sum farið verður undir fyrsta dagin, verður har pláss fyri 12 næmingum og einum lærara at hava umsjón.

Haraftrat er landsstýrið saman við Landsskúlafyrisitingini í ferð við at kanna aðrar møguleikar, men enn eru hesar samráðingarnar ikki endaðar.

Umstøðurnar á kostdeildini í Hoydølum eru vánaligar. Tveir næmingar eru á flestu kømurunum og tríggir á summum, og gevur hetta sum vituligt er ikki tær bestu lestrarmøguleikarnar. Haraftrat eru tær saniteru umstøðurnar vánaligar. Í køkinum, sum er í tí lága kjallaranum er ógvuliga trongligt at skula gera mat til fleiri hundrað næmingar. Matstovan er so lítil, at tvey og trý borðhald mugu vera til døgurða.

Landsstýrið hevur biðið Landsskúlafyrisitingina um saman við leiðsluni á skúlanum at kanna møguleikarnar fyri at byggja eina nýggja kostdeild.

Tað er eyðvitað, at verður ein nýggjur studentaskúli við HF-deild settur á stovn í Eysturoynni, so broytir hetta munandi um næmingagrundurlagið.

Viðvíkjandi øðrum ungdómi, sum kemur til Havnar av bygd fyri at søkja sær útbúgving, so má ásannast, at lítið og einki er gjørt frá almennari síðu at útvega teimum sámuligan bústað til ein rímiligan pris. Tey 20 búplássini á Læraraskúlanum og tey 48 á Skúlaheiminum saman við nøkrum á Sjúkrasystraskúlanum muna lítið til allan tann tørvin, sum er í Havn.

Eingin ivi er um, at landið og býráðið fyri langari tíð síðan áttu at havt viðurkent sín part av ábyrgdini fyri tí útviklingi, ið er hendur á hesum økinum og áttu at havt tikið avleiðingarnar av hesum við at skapa líkinda búmøguleikar fyri ungdómi av bygd, sum kemur til Havnar at læra.

Hetta landsstýrið er sinnað at virka við til at skapa møguleikar fyri betri bústaðarviðurskiftum hjá tí ungdómi, sum kemur til Havnar at søkja sær útbúgving.

6. Broyting í keypilógini

Ár 1981, mánadagin 31. august legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
samtyktar

Løgtingið samtykkir

1) at lóg nr. 147 frá 4. apríl 1979 um broyting í keypilógini verður sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan og

2) at lóg nr. 409 frá 30. november 1975 um broyting í keypilógini og kunngerð nr. 28 frá 21. januar 1980 av lóg um keyp verða lýstar at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

ad 1. Lóg nr. 147 frá 4. apríl 1979 um broytingar í keypilógini kann setast í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við neyðugum broytingum orsakað av Føroya serligu viðurskiftum.

Endamálið við lógarbroytingini er at styrkja støðuna hjá forbrúkaranum. Sum lógin nú er galdandi í Føroyum kunnu reglurnar í keypilógini altíð frávíkjast við avtalu. Eftir lógarbroytingini verður tó ásett, at ymsar reglur í lógini ikki kunnu frávíkjast við avtalu millum keypara og seljara, um keyparin er vanligur forbrúkari. Fyri at eitt keyp skal koma undir forbrúkarakeyp, má seljarin vera vinnurekandi og keypta vøran ikki ætlað til nýtslu í naktrari vinnu. Keyp og søla millum tveir ikki vinnurøkjandi partar verður sostatt ikki roknað sum forbrúkarakeyp, sjálvt um vøran skal nýtast vinnuliga.

Eftir lógarbroytingini fær forbrúkarin ymisk úyggj rættindir, t.d. at krevja, at seljarin bøtir um manglar við keyptu vøruni, at vøran svarar til upplýsingar í lýsingum og brochurum, og at keyparin fær betri møguleikar at reklamera um manglar við vøruni.

ad 2. Eftir lóg nr. 409 frá 30. november 1965 verður bert gjørd tann broyting í lógini, at leygardagur í samband við m.a. forfallsdagar verður javnstillaður við sunnu- og aðrar halgidagar.

Í lógarkunngerð nr. 28 frá 21. januar 1980 er keypilógin frá 6. apríl 1906 uppafturprentað við øllum seinni broytingum.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í lóganevndina, sum 8. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum og við 1. viðgerð 7. september 1981 beint í lóganevndina.

Reglurnar í keypilógini frá 1906 eru galdandi fyri keyp og sølu millum bæði vinnurekandi og aðrar, sum ikki hava hetta til vinnu. Reglurnar kunnu frávíkjast við avtalu.

Eftir lógini nr. 147 frá 4. apríl 1979 verða gjørdar tær broytingar í keypilógini, at skilt verður millum, um partarnir eru vinnurekandi ella um annar parturin í avtaluni er ein vanligur brúkari. Eftir broytingini verða eisini tiknar við fleiri nýggjar greinir í lógina, sum ikki kunnu frávíkjast til skaða fyri ein keypara, um hann er vanligur brúkari. Eisini fær brúkarin ymisk nýggj rættindi, sum hann ikki hevur eftir galdandi lóg.

Eftir lógarbroytingini nr. 440 frá 30. november 1965 verða leygardagar javnmettir við sunnu- og halgidagar í samband við rokning av forfallsdegi og við lógarkunngerð nr. 28 frá 21. januar 1980 verður keypilógin frá 1906 uppaftur prentað við øllum seinni broytingum.

Lógaruppskotini hava verið løgd fyri Føroya Keypmannafelag og Brúkarafelagið við fyrispurningi, um feløgini hava nakrar viðmerkingar til at lógarbroytingarnar verða settar í gildi her.

Brúkarafelagið heldur donsku lóggávuna vera hóskiliga, men kann bert mæla til, at broytingarnar verða settar í gildi her, um so er at lóg nr. 638 frá 21. december 1977 »om renter ved forsinket betaling m.v.« samstundis verður lýst her, fyri ikki at gera støðu brúkarans veikari, tí henda lóg avloysir § 38 í keypilógini um rentur, ið verður avtikin.

Føroya Keypmannafelag hevur einki at viðmerkja til, at lógarbroytingarnar verða settar í gildi í Føroyum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til, at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. apríl. Atkvøðugreiðsla 22. apríl. Uppskotið varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 620-1.

7. Eykafíggjarløgtingslóg 1979/8o.

Ár 1981, týsdagin 1. september legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Eykafíggjarløgtingslóg fyri árið 1979/80
Lagtingslov om tillægsbevilling for året 1979/80

Inntøkur Indtægter		Fíggjarlógtingslóg 1979/80 Finanslagtingslov kr. (1000)	Uppiskoytisjátan 1979/80 Tillægsbevilling kr. (1000)	Tilsamans Ialt kr. (1000)
§ 1	**Skattir** **Skatter**			
0010	Vanligur landsskattur ..... Sædvanlig landsskat	265.000	12.038,8	277.038,8
0070	Sjómansskattur ..... Sømandsskat	6.000	1.894,4	7.894,4
§ 12	Heilsumál	47.828	7.782,4	55.610,4
§ 13	Samferðslumál	86.200	11.145,0	97.345,0
§ 14	Skúlamál	59.250	4.174,3	63.424,3
§ 15	Vísindi, bókmentir og list	18.396	— 594,7	17.801,3
§ 16	Fiskivinna, sigling o.t.	221.775	— 11.287,0	210.488,0
§ 17	Landbúnaður og matrikulering	13.659	— 236,0	13.423,0
§ 18	Handil, iðnaður o.t.	14.671	1.551,2	16.222,2
§ 19	Almenn forsorg v.m.	99.727	13.043,3	112.770,3
§ 20	Pensjónsútreiðslur	2.300	402,8	2.702,8
§ 21	Effektivar veðhaldsbindingar í grunn	6.000	0,0	6.000,0
§ 22	Aðrar óvissar útreiðslur	1.460	511,1	1.971,1
§ 23	At leggja í ymsar grunnar v.m.	— 1.884	2.227,0	343,0
§ 24	Burturlegging til avdráttir av lánum	3.000	0,0	3.000,0
§ 25	Avskrivingar	27.500	10.839,1	38.339,1
§ 26	Ymsar ognarútreiðslur	150	— 118,5	31,5
		641.571	41.173,9	682.744,9

§ 6. STRANDFARASKIP LANDSINS

Meirnýtslan til strandferðsluna var 11.472.700 kr. ella 60%.

§ 6. 0115. BUSSRUTURNAR OG SAMFERDSLUNEVNDIN

Meirnýtslan til bussruturnar var 1.341.600 kr.

Av hesum hevur hallið av rutunum Bygdaleiðir/Tórshavn-Vestmanna og Tórshavn-Kirkjubø verið 432.000 kr. og ruturnar hjá Bygdaleiðir á Sandi, sum byrjaðu í fíggjarárinum 719.262,00 kr. Felagsútreiðslurnar til Bygdaleiðir vóru 100.356 kr.

§ 11.1110 FISKIVINNUSTOVAN

Meirnýtslan var 51.500 kr. ella 12%. 18.100 kr. eru brúktar meir enn játtað til lønir til tænastumenn, 54.400 kr. meir enn játtað til starvsmenn og 24.100 kr. meir enn játtað til aðrar skrivstovuútreiðslur.

§ 11. 1120 UTTANRÍKISTÆNASTAN Í ABERDEEN

Meirnýtslan uppá 78.600 kr. ella 29% stavar meginpartin meirnýtslu til postgjald, sum er 17.100 kr. meir enn játtað og til telefon og telex, sum er uppá 39.300 kr. meir enn játtað.

§ 11. 1125 UTTANRÍKISTÆNASTAN Í KEYPMANNAHAVN

Meirnýtslan var uppá 50.200 kr. ella 13%. Meirnýtslan til ferða- og dagpening var 12.900 kr. til lýsingar 13.600 kr. og til aðrar útreiðslur 9.500 kr.

§ 11. 1170 ALMANNASTOVAN

Meirnýtslan uppá 237.500 kr. ella 16% stavar meginpartin frá løn til starvsfólk; har brúktar eru 228.700 kr. meir enn játtað, 25.500 kr. eru brúktar meir enn játtað til EDV og 21.800 kr. meir enn játtað til aðrar skrivstovuútreiðslur.

§ 11. 1171 DAGPENINGASKIPANIN

Meirnýtslan uppá 133.700 kr. ella 29% stavar frá:

Lønir til starvsfólk uppá 19.200 kr., lønir til avloysarar 18.500 kr., prentlutir 33.700 kr., EDV-útreiðslur til 33.500 kr. og øðrum skrivstovuútreiðslum uppá 63.600 kr.

§ 11. 1201 FØROYA GJALDSTOVA

Meirnýtslan uppá 1.236.000 kr. ella 18% stavar frá:

Lønir til starvsfólk 199.900,00 kr., lønir til avloysara 206.600,00 kr., úrtiðarlønir 150.200,00 kr., prentlutir 155.200,00 kr., postgjald 138.900,00 kr. og EDV-útreiðslur.

§ 11. 1240 TOLLEFTIRLITIÐ

Meirnýtslan uppá 222.100 kr. ella 12% stavar meginpartin frá lønum til tænastumenn, sum var 182.300 kr. meir enn játtað.

§ 11. 1260 FERDA- OG DAGPENINGUR

Meirnýtslan til ferða- og dagpening var 726.400 kr. ella 73%.

§ 11. 1295 OGNIN TINGANES

Meirnýtslan var 115.600,00 kr. ella 14%.

Til løn til starvsfólk var brúkt 25.800 kr. meir enn játtað, til løn/reingerð 83.900 kr. meir enn játtað og til el, hita og vask 16.200 kr. meir enn játtað.

§ 12. 2010 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 33.027.000 kr. Roknskapurin visir nú, at brúktar eru 38.755.081 kr. Meirútreiðslan er sostatt 5.728.081 kr.

§ 12. 2020 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7.722.000 kr. Roknskapurin visir nú, at brúktar eru 9.596.697 kr. Meirútreiðslan er sostatt 1.874.697 kr.

§ 12. 2030 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.325.000 kr. Roknskapurin visir nú, at brúktar eru 5.078.514 kr. Meirútreiðslan er sostatt 753.514 kr.

§ 13. RAKSTRARSTAÐ NÝGGIR VEGIR OG BRÝR, BREIÐKAN AV BRÚM OG UMSITING AV VEGUM.

Játtaður og nýttur peningur í fíggjarárinum 1980/81:

Nýttur peningur til vegir v.m.		98.371.504
Játtan (§ 13-1) nýggir vegir, vega-umsiting v.m.	35.000.000	
Játtan (§ 13-6) Grunnur til berghol og brúgvagerð	5.000.000	
Rentur tilskr. 0-6460	2.980	
§ 41-2 fíggjan við láni	41.000.000	
Kommunanna partur	6.226.468	87.229.448
Munur		11.142.056

Nýttar eru sostatt 11.142.056 kr. meir enn játtaðar á fíggjarlógini.

§ 14. 2215 HF-SKEID Í SUÐUROY

Meirnýtslan uppá 370.000 kr. ella 21% stavar meginpartin frá meirnýtslu til løn til

tímaløn 107.100 kr., úrtíðarløn uppá 182.500 kr. og ferða- og dagpening uppá 69.400 kr.

§ 14. 2216 HF-SKEIÐ Í KLAKSVÍK

Meirútreiðslan uppá 488.900 kr. ella 40% stavar megnpartin frá lønarútreiðslum. Til løn/sáttmálaløn vóru brúktar 154.600 kr. meir enn játtað, til tímaløn 134.300 kr. og til úrtíðarløn 119.900 kr. Til ferða- og dagpening vóru brúktar 43.700 kr. meir enn játtað.

§ 14. 2220 STUDENTASKÚLIN OG HF-SKEIÐ

Meirnýtslan uppá 1.523.700 kr. ella 19% stavar so gott sum øll beri frá meirnýtslu til lønir. Meirnýtslan til løn til sáttmálaløn var 615.700 kr., til tímaløn 221.500 kr. og til úrtíðarløn 618.500 kr.

§ 14. 2260 KVØLDSKÚLAR

Meirútreiðslurnar hava fyri hvat landskassanum viðvikur verið uppá 458.300 kr. ella 74%. Hetta kemst av øktum aktiviteti á kvøldskúlaøkinum.

§ 14. 2310 FØROYA LANDSBÓKASAVN

Í mun til játtanina á figgjarløgtingslógini hevur Føroya Landsbókasavn nýtt 282.500 kr. meira.

Av hesum eru 179.800 kr. játtaðar til keyp og innbinding av bókum. Hesin peningur er í árinum játtaður av figgjarnevndini.

§ 15. NÁTTÚRUFRIÐINGARNEVNDIR

Av meirnýtsluni uppá 72.900 kr. ella 91% eru 66.300 kr. brúktar til samsýningar.

§ 16. VRAKARASTOVNURIN

Meirnýtslan var 168.200 kr. ella 15%. Í árinum eru brúktar 187.600 kr. meira enn játtað til lønir til tænastumenn.

§ 16. 2431 VAKTARSKIPIÐ TJALDRIÐ

Meirnýtslan á hesi konto var 1.304.000 kr. ella 23%.

Á løgtingsfiggjarlógini vóru játtaðar 300.000 kr. til skipasmiðjuútreiðslur, meðan nýttar vóru 2.089.800 kr. Tjaldrið var á Skála Skipasmiðju, har bæði botnurin og maskinan vórðu umvæld.

Annars er eingin av játtanunum á hinum konti uppbrúktar.

§ 16. 2495 NÓNHAMAR

Roknskapartalið vísir nú eitt rakstrarhall uppá 803.619,89 kr., og verður hetta óivað størri, tá endalig uppgerð fyriliggur fyri 1980/81.

§ 18. 2726 FILMSEFTIRLITIÐ
Meirnýtslan uppá 90.200 kr. ella 226% stavar einans frá samsýningum.

§ 18. 2732 KOLAGREVSTUR
Á hesi konto eru brúktar 201.500 kr. meir enn játtað á figgjarløgtingslógini.
Í árinum hevur figgjarnevndin veitt játtan uppá 200.000 kr.

§ 18. 2733 FØROYA LÆRURÁÐ
Meirnýtslan uppá 29.800 kr. ella 30% stavar frá samsýningum.

§ 18. 2735 ENDURRINDAN AV LÆRLINGALØNUM
Hetta eru lógbundnar útreiðslur. Løgtingslóg um broyting í lærlingalógini kom í gildi í figgjarárinum. Landskassin endurrindar lærumeistaranum 50% av lógásettu lærlingalønini, meðan lærlingarnir ganga á tekniskum skúla. Til endamálið vóru brúktar 476.338 kr.

§ 18. 2790/3502 STUÐUL TIL ÍDNAÐARFREMJANDI ENDAMÁL
Á hesi konto vóru játtaðar 2.250.000 kr. Brúktar eru 715.400 kr. ella 32% meir enn játtað.

§ 19. 2805 FÓLKAPENSIÓN
Meirnýtslan var 4.515.500 kr. ella 11 %. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

§ 19. 2810 AVLAMISPENSIÓN
Meirnýtslan var 1.999.000 kr. ella 12%. Hetta eru lógbundnar útreiðslur.

§ 19. 2845 HJÁLP EFTIR § 15.
Meirnýtslan var 93.700 kr. ella 16%. Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

§ 19. 2850 EINKJUHJÁLP — § 22
Meirnýtslan var 330.600 kr. ella 19%. Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

§ 19. 2855 BARNAFORSORG
Meirnýtslan var 692.400 kr. ella 34%. Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

§ 19. 2860 HEIMAHJÁLPARSKIPANIN.
Meirnýtslan var uppá 4.765.200 kr. ella 104%. Meirnýtslan stavar frá hækkaðum lønum og hækkaðum tali av klientum.
1. apríl 1979 var talið av klientum 480 og talið av heimahjálparum 240
15. mars 1980 var talið av klientum 610 og talið av heimahjálparum 330
15. sept. 1980 var talið av klientum 661 og talið av heimahjálparum 380
15. juni 1981 var talið av klientum 732 og talið av heimahjálparum 380.

§ 2901 EFTIRLØNARÚTREIÐSLUR

Meirnýtslan var uppá 402.800 kr. ella 18%. Í løgtingsvali hevur verið í árinum, og aðrir landsstýrismenn hava tikið við. Hetta hevur ført við sær, at biðipeningurin er so nógv størri enn mett.

§ 25 AVSKRIVINGAR, BYGNINGAR — ANLEGG

Á løgtingsfiggjarlógini vóru avsettar 27.500.000 kr. til avskrivingar. Roknskapartalið vísir, at avskrivingarnar eru 38.339.054,45 kr., tað eru 10.839.100 kr. meira enn mett. Meginparturin av muninum stavar frá teimum nýggju skipunum, ið landið hevur keypt. T.d. eru Teistin, Magnus Heinason og Nónhamar komnir aftrat. Umframt hetta er avskriving av útbyggingini av flogvøllinum og umleið 1. milj. kr. av ítróttar- og skúlabygging komin aftrat í árinum.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. november legði fram suljóðandi.

ÁLIT

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 1. september 1981 og undir 1. viðgerð 7. september 1981 beint í figgjarnevndina.

Eftir uppskotinum verða inntøkurnar settar til kr. 660.870.000,00 meðan samanlagdar útreiðslur eru settar til kr. 682.744.900,00, soleiðis at útreiðslumunur verður upp á samanlagt kr. 21.868.000,-.

Inntøkan á eykafiggjarlógini kr. 18.900,000 er 2,9% hækking samanborið við inntøkutalið á sjálvari figgjarlógini, sum var kr. 641.951.000,-.

Skattaálikningin fyri 1980/81 var kr. 12.892.400,00 minni enn mett á figgjarløgtingslógini, meðan tollurin gav kr. 13.010.700,00 meira enn mett.

Útreiðslan á eykafiggjarlógini kr. 41.173.900.00 er 6.4% hækking samanborið við útreiðslutalið á sjálvari figgjarløgtingslógini, sum var kr. 641.571.000,00.

Tær grundir fyri at tølini á seinastu figgjarlóg gjøgnum árið ikki hava kunnað hildið eru, soleiðis sum tað eisini hevur vist seg í undanfarnu árum, hesar:

1. Inntøkur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftaná samtykt figgjarlógarinnar.

2. Útreiðslur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftaná samtykt figgjarlógarinnar.

3. Útreiðslur, ið hvørki høvdu heimild í figgjarlógini ella í øðrum lógum, men sum hava fingið fyribils játtan figgjarnevndarinnar.

4. Bæði inntøkur og útreiðslur, ið standast av ávikavist broyttum inntøkuviðum.

skiftum og broyttum útreiðsluviðurskiftum aftaná, at figgjarlógin verð samtykt ella bert av tí, at ikki hevur verið rætt mett um inntøkur og útreiðslur, tá figgjarlógin verð samtykt.

Fins og í álitinum frá figgjarnevndini áður áleggur figgjarnevndin landsstýrinum at syrgja fyri, at leiðslurnar á teimum ymsu stovnunum húsast so,

1. at tølini á figgjarløgtingslógini verða hildin,

2. at arbeiðið verður gjørt innan fyri tær játtaðu upphæddir, sum samsvara við hvørt annað (effektivisering).

Annars førir **Adolf V. Hansen** fram:

Postverk Føroya er stovnað av dønum og eftir donskum sniði, men var fyri táum árum síðani yvirtikið av føroyingum.

Tað verður tó framvegis rikið eftir sama sniði og hevur sera vánaligar umstøður at arbeiða undir.

Hetta kann vera frágreiðingin til, at hall postverksins sambært eykafiggjarlógina er í stórum vøkstri.

Tað hevur tí bráðskund at gera tær neyðugu útbyggingarnar á hesum øki eins og sniðið má gerast føroyskt og harvið minni kostnaðarmikið.

Í hesum sambandi kann verða víst á, at meðan eitt bræv upp á 20 gram í 1978 kostaði í meðal umleið 120 oyru at flyta frá eini samlistøð til eitt hús, kostaði ein posi upp á 20.000 gram í meðal 79 oyru at flyta frá einum húsi til eina samlistøð, sambært álit Føroya Kommunufelags um renovatiónsmálið 1978, bls. 16.

Adolf V. Hansen setir sostatt fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin at kanna, hví brøv kosta 1.500 ferðir so nógv at flyta til eini hús, sum frá einum húsi.

Adolf V. Hansen og Ove Mikkelsen føra fram:

Áðrenn veganetið var útbygt, høvdu strandferðslan og onnur feløg og einstaklingar

regluligt ferðasamband til at kalla øll smá og stór pláss.

Tað almenna hevur yvirtikið at kalla allan flutning við ti úrsliti, at tey ið einki akfar hava, í mongum førum nú ikki hava aðrar møguleikar at ferðast bygdanna millum enn til gongu.

Her kann nevnast, at at kalla allar bygdir í Eysturoy uttan tær við skipasambandi, einki ferðasamband hava, t.d. Funningsfjørður, Elduvík, Oyndarfjørður, Hellurnar og Fuglafjørður, bert fyri at nevna nakrar í norðara enda. Kundu eins væl nevnt Selatrað, Morskranes og Kolbeinagjógv og aðrar, sum t.d. Rituvík og Æðuvik. Hetta sama ger seg galdandi fyri alt ov mong pláss kring alt landið.

Harafturímóti eru tað onnur pláss, sum hava alment samband at kalla hvønn tima frá kl. 06.00 til kl. 23.00.

Í figgjarárinum 1980/81 høvdu bussruturnar eitt halt upp á umleið kr. 1,6 mitj.

Høvdu verandi bussar røkt fleiri bygdir enn nú, um enn við lægri frekvensi, so gjørdist hallið helst til ágóða, og fleiri fólk fingu ferðamøguleikar.

Adolf V. Hansen og Ove Mikkelsen seta fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við Bygdaleiðir og aðrar, um at røkja sambandið við fleiri bygdir enn nú við verandi bussum.

9. december legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

UPPÍSKOYTISÁLIT

Minnilutin (Ove Mikkelsen) hevur hesar viðmerkingar til Postverk Føroya: At hallið uppá stivar 2 mió. kr. hjá hesum stovni í høvuðsheitum stavar frá, at postgjøldini hava verið óbroytt, síðan postverkið varð yvirtikið, meðan lønir og aðrar fastar útreiðslur støðugt eru hækkaðar ár frá ári.

Sammetast kann við postgjøld í okkara grannalondum, at hesi eru støðugt hækkandi í samsvar við lønarhækkan og inflatión.

Postverkið gav yvirskot tey fyrstu árini, og metir minnilutin at hetta yvirskot kann varðveitast um Føroya Landsstýri fylgir teimum ráðum, yvirpostmeistarin mælir til:

1) At hækka postgjøldini í samsvar við, hvat er gjørt í granna- og norðanlondum.

2) At posthúsini verða stongd leygardag.

Tessvegna setir tingmaðurin (Ove Mikkelsen) fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

1. At Føroya Landsstýri gevur Postverk Føroya loyvi til at hækka postgjøldini tess til tey, ið eru galdandi í Danmark.

2. At posthúsini verða stongd leygardag, og hava opið í staðin mikudag til kl. 18.00 og friggjadag til kl. 18.30.

2. viðgerð 11. december, § 1 samtykt við 27-0 atkvøðum, §§ 2-8 30-0, §§ 10-26 við 30-0, at fara til 3. viðgerð samtykt við 30-0. Uppskot til samtyktar frá Ova Mikkelsen pkt. 1 fall við 13-0 og pkt. 2 við 3-0. Uppskot til samtyktar frá Adolf Hansen fall við 3-0. Uppskot til samtyktar frá Ova Mikkelsen og Adolf Hansen samtykt við 21-0.

3. viðgerð 15. december. Málið varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 400-31. Lóg nr. 25 frá 12. februar 1982.

---

9. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann

Ár 1981, mánadagin 31. august varð boðað frá einum fyrispurningi frá Karini Kjølbro, løgtingslimi, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hevur landsstýrið tikið nøkur stig til at seta í verk kanning av arbeiðsviðurskiftun-

um hjá ungfólki millum 16 og 18 ár, sum eitt sameint løgting avgjordi hin 9. mars í ár?

VIÐMERKINGAR:

Hin 28. januar í ár setti tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi uppskot: Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta í verk kanning um, hvussu nógv arbeiðsfør ungfólk — millum 16 og 18 ár — eru uttan lønað arbeiði við tí fyri eygað at seta í verk tiltøk, ið útvega nýggj arbeiðspláss.

Í álitinum frá sosialu nevndini verður sagt, at nevndin er samd um, at tað vandamál, uppskotið snýr seg um, hevur stóra ávirkan á ungfólk okkara, eins og nevndin tók undir við stórum pørtum av viðmerkingunum.

Tá ið uppskotið varð lagt fram, var tað longu tá hildið at hava skund, og tessvegna var eisini mælt til, at kanningarhátturin var sera einfaldur, uttan at neyðugt skuldi vera at seta nýtt fólk til at fáa greiðu á hesum.

Síðani er ein nýggjur árgangur komin úr fólkaskúlanum, og við skúlaársbyrjan hava vit sæð, at trýstið á Studenta- og HF-skúlan er munandi øki, hjá summum kanska meiri av neyð — vegna tvørrandi arbeiðs- ella lærupláss — enn av hugi.

Í fylgiskjølunum til løgmansrøðuna verður frá Føroya Iðnaðarstovu hnðað frá, at væntiliga verður krevið til nýggj arbeiðspláss innan iðnað, handverk og tænastuiðnað o.u. 200 um árið ella 2000 fram til 1991. Tað er vinnan sjálv, ið her vísir á nýggjar framtaksleiðir.

Eftir tí vit vita, hevur landsskúlafyrisitingin nú fingið tey størv sett, ið ætlað vóru neyðug, fyri at henda fyrisiting kundi virka sum ætlað.

Tá uppskotið um arbeiðsviðurskiftini hjá teim ungu varð lagt fram, var m.a. spurningurin um mistrivnað hjá ungdóminum og avleiðingarnar av hesum umrøddur. Fleiri eru, sum bendir á, at støðan er batnað á hesum øki síðan januar í ár.

Spurningurin er nú, um landsstýrið ætlar at fylgja løgtingssamtyktini ella aðrar ætlanir eru, nú íðnaðarfelagið hevur mett, at tørvur er á 200 nýggjum arbeiðspláss-um um árið, og landsskúlafyrisitingin er vorðin fullmannað.

1. september varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Eilif Samuelsen skuldi svara fyrispurninginum.

9. september var fyrispurningurin svaraður av Eilif Samuelsen, landsstýrismanni, soleiðis:

SVAR

Spurningurin var soljóðandi:

»Hevur landsstýrið tikið nøkur stig til at seta í verk kanning av arbeiðsviðurskift

unum hjá ungfólki millum 16 og 18 ár sum eitt sameint løgting avgjørdi hin 9. mars í ár?«

Landsstýrið ásannar at tað er ein stór hóttan fyri eina og hvørja tjóð, um arbeiðsloysi er millum tað vinnuføra fólkið. Meinast er tann negativa ávirkanin, um arbeiðsloysi er millum ungdómin. Hetta eru dýrgoldin prógv fingið um í nógvum londum í Vesturevropu hesi seinastu árini.

Landsstýrið arbeiðir tí miðvist fram ímóti at varðveita so nógv arbeiðspláss sum yvirhøvur gjørligt og harafturat at skapa so nógv nýggj arbeiðspláss, at arbeiði verður fyri allar arbeiðsførar hendur her á landi.

Miðað verður eisini fram ímóti at geva ungdómunum so góðar møguleikar fyri útbúgving bæði teoretiskt og praktiskt, at henda útbúgving kann vera eitt dygt grundarlag undir framtíðar vinnustarvi teirra.

Sum kunnugt hava vit her á landi onga regluliga skráseting av møguligum arbeiðsloysi og tí heldur ikki av ungdómi millum 16 og 18 ár serliga.

Landsstýrið arbeiðir við at finna fram til ein kanningarhátt, ið kann geva eina sanna mynd av arbeiðsviðurskiftunum hjá ungfólki. Roknast kann við, at henda kanning kann setast í verk um ikki so langa tíð.

---

10. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi nýggjari royndarstøð

Ár 1981, mánadagin 31. august legði Tórálvur Mohr Olsen, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin

1. at steðga øllum fyrireikingum til bygging av nýggjari royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Heygsgarði.
2. at fara undir fyrireikingar til at seta á stovn royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Sandoynni.

VIÐMERKINGAR:

Í 1978 samtykti løgtingið at heimila landsstýrinum at skipa fyri bygging av

nýggjari royndarstøð við møguleikum at skipa fyri útbúgving.

Lógin, sum gav landsstýrinum hesa heimild, nevnir einki um, hvar í landinum tann nýggja royndarstøðin skal liggja. Tann avgerðin varð í roynd og veru latin landsstýrinum upp í hendur, og hevur løgtingið helst tikið hesa avgerð í teirri vón, at landsstýrið fór at velja at leggja nýggju royndarstøðina á tað best møguligu hóskandi plássið.

Tá tað nú í seinastuni er vorðið greitt fyri almenninginum, at landsstýrið í álvara umhugsar at leggja royndarstøðina á Heyggi í Kollafirði, má tað metast at vera beint at taka málið upp aftur eina ferð enn á Føroya Løgtingi.

Metast má, at tað er bæði beint og neyðugt at taka hetta málið upp aftur, grundirnar til hetta eru fleiri, her skal verða vist á nakrar av teimum.

Fyri tað fyrsta eru nógvir búnaðarmenn samdir um hetta, at Heygsgarður ikki er hóskandi til royndarstøð, sum skal kunna virka sum búnaðarskúli, fyri tað næsta vísa tær viðgerðir, hetta mál hevur fingið á løgtingi t.d. í 1977, at Føroya løgting stórliga ivaðist í, um Heygsgarður var rætta loysnin.

Annars er málið um royndarstøð og landbúnaðarskúla eitt ógvuliga gamalt mál á løgtingi, og má gongdin í hesum máli tí metast at vera tingmonnum kunnug. Tað er sostatt eingin orsøk til at koma við nøkrum søguligum yvirliti. Annars sæst gongdin væl í løgtingsmáli nr. 65/1976, 82/1977 og 69/1978. Uppskotsstillarin er samdur við teimum mongu, sum eru av tí áskoðan, at Heygsgarður er illa hóskandi til nýggja royndarstøð og til tann nýggja búnaðarskúlan, sum vónandi við tíðini kemur at liggja saman við royndarstøðini.

Hetta uppskot til samtyktar er tí ein roynd at fáa løgtingið at velja eina skilabetri loysn enn ta loysn, landsstýrið nú tykist at vera í ferð við at føra út í lívið.

Eisini er hetta ein roynd at steðga ætlanini við Heygsgarði, áðrenn alt ov long tíð og alt ov nógvur peningur verða brúkt uppá eitt projekt sum uppá forhond má metast sum mislukkað.

Støðan í hesum máli er sum nevnt tann, at løgtingið í 1978 tíverri gav landsstýrinum rættiliga frían hendur í spurningunum um, hvar royndarstøðin skuldi liggja. Tann einasta treytin, løgtingið legði við, var, at figgjarnevndin skuldi góðkenna kostnað, figging og rakstur. Um nú málið ikki kemur aftur í figgjarnevndina, fyrrenn alt projekteringsarbeiðið og fyrireikingararbeiðið er liðugt, mugu møguleikarnir hjá figgjarnevnd, og harvið løgtingi, til tess at hava nakra *álvarsama* ávirkan á hetta mál metast at vera smáir.

Út frá hesum eru allar orsøkir til, at løgtingið, enn einaferð tekur hetta mál upp aftur til umhugsingar. Sjálvur loyvi eg mær at seta fram uppskot til samtyktar um, at royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum verður løgd á Sandoynni. Her skal stutt vera greitt frá, hví ein slík loysn má metast sum tann skilabesta.

Sum øllum kunnugt er Sandoyggin búnaðaroyggin burturav, tendið bæði innan- og uttangarða er sera væl hóskandi til alt slag av landbúnaði, sum kann røkjast í Føroyum. Uttan at taka nakað frá øðrum, kunnu øll verða samd um, at búnaðarmenn á Sandoynni eru framúr dugnaligir til teirra virksemi. Teir hava megnað at

fylgi við tíðini og hava veruliga nútímansgjørt síni brúk. Nógvir av hesum búnaðarmonnum hava sýnt bæði vilja og evni til at samarbeiða á ymsum økjum til tess at fáa bø og haga at geva sum mest.

Av hesum fylgir, at tað á Sandoynni eru allir møguleikar fyri ti samskifti millum búnaðarmenn og skúla- og royndarstøð, sum er ein høvuðsfyritreyt fyri einum vælvirkandi stovni av slíkum slagi.

Her kundu nógvar aðrar tungtvigandi grundir verið nevndar, men tað kann vera nóg mikið við einari í hesum umfari. Hon er meira av politiskum enn av fakligum slagi og snýr seg um tað, vit við einum breiðum hugtaki kalla bygdamenning. Hesi seinnu árini hava vit á tingi talað nógv um bygdamenning, vit hava eisini eftir hesari talu at døma verið samd um hetta hugtak. Eisini hava vit verið samd um at nýta almennar stovnar sum eitt amboð í bygdamentingini. Kortini hevur tað sjáldan eydnast okkum at liva upp til hetta sjónarmið — kanska ti at almennir stovnar ofta vilja hava sítt náttúrligu stað í høvuðsstaðnum.

Men hin vegin, at ein royndarstøð, sum eisini skal virka lutvist sum búnaðarskúli, ikki skal kunna setast á stovn og ikki skal kunna virka uttan at hon verður kroyst upp í Havnina, haldast at vera ovboðið,

At tað er bæði rætt og rímiligt út frá einum bygdamentningarligum sjónarmiði at leggja royndarstøð og búnaðarskúla í Sandoynni, sæst av ti beint einfaldu grund, at her er talan um ein av teimum fáu stovnunum, sum verkuga kann liggja á Sandoynni. Út frá hesum sjónarmiði loyvi eg mær at seta hetta uppskotið til samtyktar.

Í. viðgerð 7. september. Málið varð beint í serliga landbúnaðarnevnd, sum 23. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Uppskotið er lagt fram av Tórálvi Mohr Olsen tann 31. august 1981 og við fyrstu viðgerð 7. september 1981 beint í landbúnaðarnevndina.

Uppskotið gongur út uppá at steðga øllum fyrireikingum til bygging av nýggjari royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Heygsgarði, og at farið verður undir fyrireikingar til at seta á stovn royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Sandoynni.

Nevndin hevur havt fund um málið við umboðum fyri

Jarðaráðið

Búnaðarfelagið

Bóndafelagið og

Seyðaráðgevarin,

Umboðini vóru samd í ti at tað var neyðugt fyri føroyska landbúnaðin at farið varð undir at byggja landbúnaðarroyndarstøð beinanvegin, men semja var ikki um, hvar aki var best egnað.

Á fundinum kom eisini fram, at royndarstøðin i Hovvik ikki virkaði eftir ætlan.

Meirilutin (Erlendur Patursson, Tórálvur M. Olsen, Jógvan Olsen og Hilmar Kass) átalar at stjórin fyri royndarstøðini varð uppsagdur uttan at hóskandi leiðsla varð sett i staðin.

Øssur Dam Jacobsen tekur tó undir við, at nýggjur stjóri eigur at verða settur beinan vegin.

Ein meirluti (Øssur Dam Jacobsen, Hilmar Kass og Jógvan I. Olsen), førir fram, at í løgtingslóg nr. 96 frá 1. november 1978 stendur

»§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at byggja nýggja landbúnaðarroyndarstøð, sum eisini kann fyriskipa útbúgving innan landbúnað. Landsstýrinum er heimilað at taka neyðug lán til byggingina.

§ 2. Landsstýrið tekur sær serkønt fólk at finna hóskandi øki at leggja tilika stað á og fremja projektering. Tá hetta er gjørt, kann landsstýrið við góðkenning figgjarnevndarinnar av kostnaði, figging og raksturi, fara undir byggingina.«

Í gerðabók landsstýrisins dagfest 8. november 1978 framgongur, at táverandi landsstýri hevur samtykt, at nýggjur búnaðarskúli og royndarstøð verða bygd á Heygsgarði i Kollafirði.

Í gerðabók landsstýrisins dagfest 8. mai 1981 framgongur, at núsitandi landsstýri hevur staðfest at fremja samtyktina um at flyta royndarstøðina til Heygsgarð i Kollafirði, og at støðin verður bert royndarstøð og ikki landbúnaðarskúli.

Visandi til omanfyri framførda, setir meirilutin eitki uppskot fram.

Minnilutin (Erlendur Patursson) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Tórálvur Molu Olsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

---

2. viðgerð 28. april. Uppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

11. Rammusáttmáli millum Danmark og Kanada um føroysk fiskirættindi í kanadiskum sjógvi

Ár 1981, friggjadagin 4. september legði Pauli Ellefsen, løgmaður vegna Landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið góðkennir hjálagda sáttmála millum kongarikið Danmark og Kanada viðvíkjandi føroyskum fiskiskapi við kanadisku strondina frá 3. juni 1980.

VIÐMERKINGAR:

Sáttmálin, sum eftir kanadiskum ynski er avtalaður millum kongarikið Danmark og Kanada, er eitt sonevndur rammusáttmáli, ið fastleggur høvuðsreglurnar fyri føroyskum fiskiskapi i kanadiskum farvatni fyri eitt tíðarskeið. Sáttmálin rennur viðari til hann verður uppsagdur. Hann kann uppsigast av báðum pørtum tann 1. januar 1983, ella aftaná eitthvørt tveyvara tíðarskeið aftaná tað, treytað av, at fráboðan um uppsøgn er givin i minsta lagi 12 mánaðar áðrenn slíka uppsøgn.

Samstundis við at rammusáttmálin kemur i gildi, fer sáttmálin frá 27. mars 1972 millum Danmark og Kanada, ið heimilar føroyskum fiskiskapi innanfyri táverandi kanadiska 12-fjórðinga markið úr gildi.

Hesin rammusáttmáli fylgir í høvuðsheitum ti mynstri, ið Kanada hevur fastlagt fyri rammusáttmálat við lond, ið fáa fiskirættindi innanfyri kanadiska 200-fjórðinga markið.

Sáttmálin, ið er eitt treyt fyri, at kanadiskir myndugleikar kunnu veita føroyskum skipum fiskirættindi á kanadiskum fiskioki, varð í høvuðsheitum fiðugt samráddur á sumri 1978, og varð undirtiaðu av umboðum fyri uttanrikismálaráðið og landsstýrið 3. juni 1980 i Ottawa.

Samtaert avtaluma áteknir stjórn Kanada sær at lovva føroyskum skipum at fiska hóskandi kvotur, ið tillutaðar verða av ti avlopi av mestloyvdu veiðumegdini, sum fer upp um tað, ið Kanada sjálvt er fært fyri at fiska.

Hesi rættindi eru avmarkað til økið millum 12 og 200 fjórðingar, tó við undantaki

av, at føroysk skip framhaldandi fáa ongongd til at fiska hemara á ávisum økjum í St. Lawrence flogvanum.

Í sáttmálanum plikta partarnir seg til at samarbeiða eisini um varðveiting av fiskastovninum út fyri eysturstrond Kanada uttanfyri 200-fjórðinga marknið á Stóra Banka og á Flemish Cap.

Sambært grein 5 viðurkenna báðir partar, at lond, ið hvørs ám anadromir fiskastovnar hava sin uppruna, hava høvuðsáhugan fyri og høvuðsábyrgdina av slíkum stovnum, og eru samdir um, at veiða eftir slíkum stovnum ikki eigur at fara fram uttanfyri tað økið, har londini hava yvirvaldsrætt viðvíkjandi fiskiskapi. Føroysk skip, sum fiska uttanfyri føroyska fiskimarkið skulu lata vera við at taka anadrom fiskasløg, sum eru gýtt í kanadiskum farvøtnum.

Partarnir átaka sær at samráðast um, hvussu sáttmálin skal virka, og kanna møguleikarnar fyri víðarigangandi samarbeiði innan fyri fiskivinnuna.

Kvoturnar, sum Kanada tillutar føroyskum skipum, verða tilluttaðar einvist frá kanadiskari síðu eftir føroyskum ynski, og møguleikar eru fyri samráðingum um slíkar kvotur.

Sáttmálin kemur í gildi, tá ið báðir partar hava boðað hvørjum øðrum frá, at tann málsviðgerð, ið neyðug er, er fullførd, men í praksis hevur verið gingið eftir sáttmálanum alt síðan 1978.

Tann málsviðgerð, ið skal til, er at løgtingið góðkennir sáttmálan, og at landsstýrið síðan boðar donsku stjórnini frá hesum. Danska stjórnin sendur síðani boðskriv til kanadisku stjórnina, um at málsviðgerðin er lokin teirra megin, og tá ið kanadiska stjórnin hevur boðað frá ti sama, er sáttmálin galdandi.

Sí skjal 3.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 9. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð 7. september 1981 beint í marknaðarnevndina.

Ein samd marknaðarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 14. september. Málið endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-4-1.

12. Góðkenning av sáttmálanum um framtíðar margparta samvinnu um fiskiskapin í landnyrðingsatlantshavi

Ár 1981, fríggjadagin 4. september legði Pauli Ellefsen, løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið góðkennir viðlagda sáttmála frá 18. november 1980 um framtíðar margparta samvinnu um fiskiskapin í Landnyrðingsatlantshavi (NEAFC).

Sáttmálin, ið undirritaður var 18. november 1980 í London, er ætlaður at koma í staðin fyri NEAFC-sáttmálan frá 1959.

Tá ið fiskimarkini í Landnyrðingsatlantshavi vóru útflutt á 200 fjórðingar í 1977 og áðrenn, gjørdist tann gamli NEAFC-sáttmálin ónýtiligur. Tí varð farið í holt við at arbeiða fram ímóti einum endurskoðaðum sáttmála, sum bygdi á, at strandalondini høvdu yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi út á 200 fjórðingar.

Arbeiðið við at endurskoða NEAFC-sáttmálan dróg út mest orsakað av ósemju um á hvønn hátt EEC skuldi taka lut. EEC-londini samtyktu, at lata seg umboða í einum nýggjum sáttmála av EEC, meðan ávís onnur lond høvdu trupult við at góðtaka eina slíka loysn.

EEC-londini, har imillum Danmark, søgdu seg burtur úr NEAFC-felagsskapinum við árslok 1977. Eftir føroyskum ynski kom danska uppsøgnin tó ikki at galda fyri Føroyar. Danmark hevur sostatt hesi árini verið umboðað í NEAFC vegna Føroyar, og er tað umboð fyri Føroya Landsstýri, ið hava tikið lut á fundinum síðan.

Ein diplomatfundur í London í 1978 endaði úrslitaleysur. Ikki fyrrenn á einum fundi í einum arbeiðsbólki, ið hildin varð í Lissabon í februar í 1980, eydnaðist tað at loysa striðsspurningarnar, og at semjast um orðaljóðið í einum nýggjum sáttmála.

Sáttmálin fevnir um sama havøki, sum gamli NEAFC-sáttmálin. Sett verður á stovn ein nevnd, har hvør sáttmálapartur hevur eina atkvøðu. Nevndin skal útinna virki sítt við varðveiting og bestu nýtslu av fiskirikidømunum í sáttmálaøkinum fyri eyga, og skal í virki sínum byggja á tað besta vísindaliga grundarlag, ið er til taks.

Nevndin skal gera tilmæli um fiskiskap uttanfyri tey øki, sum eru undir yvirvalds-

rætti sáttmálapartanna, og skulu slík tilmæli samtykkjast við kvalifiseraðum meiriluta.

Viðvikjandi stovnum, ið ganga bæði innanfyri og uttanfyri fiskimark skal nevndin royna at miðja móti samsvari ímillum tiltøkini báðu megin markið.

Sáttmálapartarnir plikta seg til at lata nevndini neyðugar upplýsingar um fiskastovnarnar.

Nevndin kann gera tilmæli eisini viðvikjandi fiskiskapi innanfyri fiskimark, um viðkomandi strandríki biður um tað og atkvøður fyri slíkum tilmæli.

Nevndin kann geva tilmæli ella fremja orðaskifti um t.d. reglur viðvikjandi fiskiskapi og fiskitólum íroknað meskaviddir, minstu støddir á fiski, stongd øki og tíðarbil, tiltøk viðvikjandi nøring av fiski, áseting av mest loyvdu veiðunøgd og býti av slíkari millum partarnar og áseting av mest loyvdu veiðuorku og býti av henni millum partarnar.

Nevndin kann við kvalificeraðum meiriluta gera tilmæli um tiltøk viðvikjandi fiskiskapi uttanfyri økir, sum eru undir yvirvaldsrætti strandalandanna. Slík tilmæli kunnu eisini gerast viðvikjandi økjum, sum eru undir strandalanda yvirvaldsrætti, men bert um viðkomandi strandaland biður um tað og atkvøður fyri tí. Nevndin kann eisini gera tilmæli um innsavning av hagtalstilfari v.m. bæði viðvikjandi havøkinum innanfyri og uttanfyri fiskimark, men eisini í hesum føri er tað so, at londini bert eru bundin innanfyri mark, um tey sjálvi atkvøða fyri tí.

Tilmæli eru bindandi uttan so er, at partarnir mótmæla. Partarnir kunnu eisini eftir at eitt ár er umliðið, siga seg ikki vera bundnar longur av einum tilmæli, teir áður vóru bundnir av.

Nevndin skal samarbeiða við altjóða ráðið fyri havrannsóknir (ICES).

Partarnir átaka sær at seta í verk neyðugar heimildir til tess at kunna hava eftirlit við teirra egna fiskiskapi á sáttmálaøkinum, og straffa brot. Frágreiðing skal hvørt ár sendast nevndini um hetta virksemi.

Limagjaldið verður býtt soleiðis, at ein triðingur av figgjarætlanini verður býttur javnt millum limirnar, meðan tveir triðingar verða býttir samsvarandi veiðinøgd partanna.

Spurningurin um hvør, ið kundi verða luttakari í sáttmálanum, varð loystur á tann hátt, at allir teir partar, ið tóku lut í fyrireikingini av sáttmálanum verða reksaðir upp í sáttmálanum. Hesir partar eru Bulgaria, Kuba, Danmark fyri Føroyar, EEC, Finland, DDR, Ísland, Noreg, Póland, Portugal, Spania, Svøriki og USSR. Allir hesir partar kunnu undirrita sáttmálan. Harumframt kann eitt og hvørt ríki, tó undantikið EEC-ríkið, gerast luttakari um so er, at eitt umsókn um luttøku verður viðurkend av 3/4 av øllum sáttmálapørtum.

Semja var partanna millum um, at hóast tað, at EEC riki ikki kunnu luttaka sum slík, so kann eitt og hvørt EEC riki søkja um upptøku fyri sín part av øki sínum, sum ikki er umfatað av EEC-sáttmálanum.

Sáttmálin varð sum nevnt opnaður fyri undirriting 18. november 1980, og hava hesir partar undirritað sáttmálan:

Kuba, Danmark vegna Føroyar, EEC, DDR, Ísland, Noreg, Póland, Spania, Svøríki og USSR.

Danmark fyri Føroyar undirritaði 18. november 1980. Undirritað varð av einum umboði fyri ríkisstjórnina og einum fyri landsstýrið, eftir at stjórnin og landsstýrið vóru komin ásamt um á hvønn hátt Føroyar skuldu umboðast í nýggja sáttmálanum.

Tá ið nóg nógvir partar hava boðað frá staðfesting, góðtøku ella góðkenning av sáttmálanum, kemur hann í gildi.

Fráboðan um staðfesting, góðtøku ella góðkenning er higartil komin frá hesum pørtum:

Ísland, Noreg.

Ætlanin er, at tá ið sáttmálin er komin í gildi fyri Danmark vegna Føroyar, fer limaskapurin í gamla NEAFC úr gildi.

Millum tey verkevni, ið tann nýggi NEAFC-sáttmálin verður at umfata, er viðgerð av tilmælum v.m. viðvikjandi svartkjaftastovninum og atlantoskandiska sildastovninum, eins væl og av øðrum stovnum, ið ferðast ímillum fiskiøki hjá fleiri sáttmálapørtum, ella millum fiskiøki hjá sáttmálapørtunum og opið hav. Hetta kann t.d. eisini gakda fyri nøkur av djúpvatnsfiskasløgunum, sum t.d. kongafisk.

Sí skjal 4

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 4. september 1981 og undir fyrstu viðgerð 7. september beint í marknaðarnevndina, ið hevur viðgjørt málið.

Samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. november. Málið varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1504-3-2.

13. Farmaskipabygging

Ár 1981, friggjadagin 4. september legði Pauli Ellefsen, løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av farmaskipum.

§ *1.* Í § 1, 2. stk. í løgtingslóg nr. 15 frá 31. mars 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum verður »5 mió. kr.« broytt til »10 mió. kr.«.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fragtskibe.

§ *1.* I § 1, stk. 2 i lagtingslov nr. 15 af 31. marts 1966 om støtte til bygning af fragtskibe ændres »5 mill. kr.« til »10 mill. kr.«.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1980 (vetrarting), jbr. løgtingsmál nr. 71: Stuðul til bygging av farmaskipum samtykti løgtingið eftir uppskoti frá landsstýrinum at geva landsstýrinum saman við fíggjarnevndini heimild til at veita upp til 10% í stuðulsláni til bygging av farmaskipum, bygd fyri føroyska rokning. Stuðulslán eru avmarkað til 5 mió. kr. fyri hvørt skipið.

Í sama máli samtykti løgtingið eftir uppskoti frá fíggjarnevndini at avtaka støddarmarkið 1.000 br. reg. tons fyri tey skip, ið kunnu koma undir stuðulsskipanina.

Grundgevingin hjá landsstýrinum fyri uppskotinum var, at áhugin fyri bygging av farmaskipum, nú fiskivinnan er í broytingartíð, er vaksandi.

Henda hellingin til farmaskipabygging er eftir landsstýrisins meting ein veruleiki, harafturat er talan um at byggja størri skip. Meðan veðhaldsheimildin fyri prioritetslánum er óavmarkað, er sum nevnt heimildin at veita stuðulslán avmarkað til 5 mió. kr. til hvørt skipið. Fyri tey størru skipini er markið ov lágt eftir landsstýrisins meting, tí verður skotið upp at broyta markið til 10 mió. kr.

Formaðurin bað um frávik í tíðarfreistini at viðgera málini nr. 13, 14 og 15. Hetta varð givið við at vera sett undir atkvøðugreiðslu. 17 atkvøddu ja, 15 atkvøddu nei.

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jákup Lindenskov, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu: Inuk Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Beck, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Sverre Midjord, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 9. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 7. september 1981 beint í figgjarnevndina.

Málið varð viðgjørt í figgjarnevndini tann 9. september 1981 og mælir meirilutin (Ivan Johannesen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Atli P. Dam, Adolf V. Hansen og Ove Mikkelsen) metir, at farmasiglingarmálið eigur at umhugsast gjølliga, fyrireikast og leggjast til rættis, soleiðis at farma- og ferðamannasigling verður tann týðandi táttur í føroyskum vinnulívi í framtíðini, sum hann eigur at verða.

Minnilutin heldur, at vit eiga allar fortreytir til at reka hesa vinnu, ikki minst í ti fólkatilfari, vit eiga.

Uppskot landsstýrisins mælir til at troyta eina grunn, sum frammanundan er ov veikur til at loysa figgjanartorvin innan fiskivinnuna, tá hugsað verður um nýggjar veiðihættir og royndir í lítið royndum stovnum. Útbygging til roynd í svartkjaftastovninum og á djúpum vatni krevur stórpening einans fyri at fáa byrjan á í umlegging av veiðiflotanum.

Hinvegin hevur tað ikki verið torført at fingið figging til farmaskipabygging, tá veðhaldsheimild landskassans hevur verið ógvuliga rúm, og við bygging uttanlands er í dag møguligt at fáa sera lagaliga figging, tí stjórnirnar í flestu londum við útbygdum skipasmiðjuídnað geva so munandi figgjanartilskot.

Uppskot landsstýrisins mælir í verulcikanum til at avloysa hesar lagaligu figgjanarmøguleikarnar — sum finnast í dag — við eini figging beinleiðis úr landskassanum (grunninum til endurnýgging av fiskiskipaflotanum). Hetta merkir, at vit minka um samlaðu figgjanarmøgulcikar okkara, tí nýggja skipanin skapar ikki øktar møguleikar, men kemur í staðin fyri ein verandi.

Minnilutin tekur kortini undir við at gera eisini figgingina av teimi seinastu 10%'unum av veðskuldarlánunum so lagaliga sum gjørligt, og mælir tí til fyribils at lata úr landskassanum eitt rentuiskoyti til hesi lán, tá rentan er hægri enn 7 1/2% og lánstíðin er í minsta lagi 10 ár. Hetta rentuiskoyti er tó avmarkað til 5% av teirri rentuupphæddd, ið svarast skal sambært upprunaligt lánsskjal, t.v.s. ikki til rentur av falnari, men ikki goldnari skuld.

Eisini verður skotið upp, at rentustuðulsskipanin er avmarkað til farmaskipabyggisáttmálar, ið gjørdir eru aftaná 1. mai 1981 ímillum føroyska skipasmiðju og føroyskan byggiharra. Hetta ti at minnilutin metir, at útlendingar í fyrsta lagi hava skyldu til at útvega figgingina, tá bygt verður á skipasmiðjum teirra.

Minnilutin heldur, at tann avmarking, sum liggur í uppskoti landsstýrisins, har seinasti prioriteturin, sum er stuðulslánið, hægst kann vera 10 milj. kr., kann hava óhepnar avleiðingar, við tað at byggiharrar freistast til at avmarka skipastøddirnar til skip, ið kosta minni enn 100 milj. kr. fyri at fáa lutfalsliga størsta stuðulslánið.

T.d. fáast ikki mong specialskip í dag fyri minni enn 50 milj. kr., og vit vita, at tað kann vera skilagott at útbyggja júst við specialskipum. Minnilutin setir ti einki mark fyri samlaða kostnaðin av skipi, ið kann fáa rentuiskoyti til aftasta prioritetin.

Minnilutanum er greitt, at møguleikar føroysku skipasmiðjunnar at byggja skip omanfyri ávísa stødd eru avmarkaðir, og ásannar tí, at serlig tiltøk mugu fremjast í teim førum, har neyðugt er at víðka um byggiorkuna (kapacitetin).

Minnilutin ásannar, at hvørki uppskot landsstýrisins ella broytingaruppskot minnilutans loysa hetta stóra mál, og at serliga uppskot landsstýrisins skjýtur loysnina av farma- og ferðamannasiglingarmálinum út í framtíðina, og tá verður slík sigling fyribils bert ein viðfáningur í vinnulívi okkara.

Landsstýrisuppskotið tykist ikki nóg gjølla umhugsað og ikki gevast stundir at viðgera málið fyrr enn seinni í hesi tingsetu so gjølla sum krevst, tí setir minnilutin samstundis fram lógaruppskot við prinsippavgerð um stovnar av farmaskipabyggigrunni og setan av kanningarnevnd, soleiðis at málinum kann tryggjast haldgóða loysn í komandi tingsetu.

Ein loysn, ið miðar meira ímóti at loysa samtaða útbyggingartørv føroyinga heldur enn at ganga ávísum seráhugamálum á møti.

Minnilutin (Atli P. Dam, Adolf V. Hansen og Ove Mikkelsen) setir fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ 1. Í løgtingslóg nr. 15 frá 31. mars 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum verða hesar broytingar gjørdar:

1) Í § 1 verður sett nýtt 2. stk.:

»Landsstýrinum er heimilað saman við figgjarnevndini at veita rentustuðul til 1/9 av prioritetslánum í farmaskipum, bygd fyri føroyska rokning á føroyskari skipa-

§ 1. I lagtingslov nr. 15 af 31. marts 1966 om støtte til bygning af fragtskibe foretages følgende ændringer:

1) I § 1 indsættes nyt stk. 2:

»Landsstyret bemyndiges til i samråd med finansudvalget at give tilskud til rente til 1/9 af prioritetslån til fragtskibe, bygget for færøsk regning på færøsk skibsværft i hen-

smiðju sambært sáttmála, undirritaðan aftaná 1. mai 1981. Rentustuðulin er avmarkaður til tann partin av rentuni, ið er omanfyri 7 1/2% av lánum lánstíð 10 ár ella meira, tó hægst 5% av eftirverandi skuld sambært upprunaligt lánsskjal.

hold til kontrakt underskrevet efter 1. maj 1981. Rentetilskudet er begrænset til den del af renten, der er over 7 1/2% af lån med løbetid på 10 år eller mere, dog højst 5% af restgæld i henhold til oprindeligt lånedokument.

2) Í § 2 verður aftaná »Veðhaldsveitingar« sett: »og rentustuðulsveitingar«.

2) I § 2 tilføjes efter »Garantiydelsen«: »og rentetilskudsydelser«.

3) Í § 4 verður aftaná »veðheldur fyri« sett: »og lán, rentustuðul verður veittur til«.

3) I § 4 tilføjes efter »garantier for«: »og lån, rentetilskud bliver ydet til«.

4) § 7 verður strikað.

4) § 7 udgår.

5) § 9 verður orðað soleiðis: »Stuðulin eftir §§ 1, 5 og 6 verður goldin úr landskassanum.«

5) § 9 affattes således: »Tilskudet efter §§ 1, 5 og 6 bliver betalt af landskassen«.

§ 2. Hendan lóg fær gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Herumframt setir sami minniluti eisini fram fylgjandi

UPPSKOT
TIL

Løgtingslóg um bygging av farma- og ferðamannaskipum.

§ 1. Stovnaður verður grunnur til bygging av farma- og ferðamannaskipum.
2. stk. Landsstýrinum er heimilað at taka lán upp í 200 milj. kr., ið verða settar sum stovnsfe grunnsins.
3. stk. Lánini verða at góðkenna av fíggjarnevnd løgtingsins.

§ 2. Landsstýrið setir serstaka skipabyggingarnevnd, ið skal gera metingar

Lagtingslov om bygning af fragt- og passagerskibe.

§ 1. Der oprettes en lånefond med det formål at yde lån til bygning af fragt- og passagerskibe.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at optage lån op til 200 mill. kr., der skal etableres som fondens grundkapital.
Stk. 3. Udlånene skal godkendes af lagtingets finansudvalg.

§ 2. Landsstyret skal nedsætte særskilt skibsbygningskommision, der skal

og tilmæli um, hvussu henda bygging skal skipast og leggjast til rættis.

§ 3. Seinast í ólavsøkutingsetuni 1981 leggur landsstýrið fyri løgtingið lógaruppskot um grunnin til bygging av farma- og ferðamannaskipum og málsøkini umrødd í §§ 1 og 2.

2. stk. Í somu tingsetu leggur landsstýrið fyri løgtingið reglugerð fyri virki grunnsins og tilmæli um fyrisæti hans og um slíkan árligan stuðul úr landskassanum til grunnin, ið setir hann føran fyri at renta og afturrinda stovnsfæið, at veita rentulág og langfreistað lán ella rentuískoyti, og at vaksa um stovnsfæið dýrtíðarviðgjørt og verunliga.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

foretage vurderinger og give indstilling, om hvordan dette byggeri skal organiseres og tilrettelægges.

§ 3. Senest til lagtingets åbning af Olajtinget 1981 skal landsstyret fremlægge lovforslag vedrørende fonden til bygning af fragt- og passagerskibe og sagsområderne i §§ 1 og 2.

Stk. 2. I samme lagtingssamling skal landsstyret fremlægge reglement for fondens virksomhed og indstilling om dens ledelse og om det årlige tilskud fra landskassen, der sætter den i stand til at forrente og tilbagebetale grundkapitalen, at yde lavforrentede og langfristede lån eller rentetilskud og at forøge grundkapitalen prisalsmæssigt og reelt.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Minnilutin hevur lítið landsstýrinum til at gera tilmæli um reglugerð, fyrisæti til skrivingar o.s.fr., men kann fyri sín part mæla til, at grunnurin fær egið fyrisæti (ella stjórn), og at dagliga umsitingin við tíðini verður løgd til landsbankan at hava um hendi.

2. viðgerð 14. september. Atkvøðugreiðsla sama dag á seinni fundi. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 19-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð samtykt við 19-0.

Uppskot frá minniluta (Atli Dam, Adolf Hansen og Ove Mikkelsen) til § 1 fall við 15-0. Uppskot frá sama minniluta í nevndini til § 1 fall við 15-0.

3. viðgerð 15. september. Málið sum samtykt við 2. viðgerð samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1401-1-2. Lóg nr. 63, 2. okt. 1981.

14. Ymisk inntøkulógaruppskot.

Ár 1981, fríggjadagin 4. september legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot I : Broyting í innflutningsgjøldum.
Uppskot II : Broyting í serliga innflutningsgjaldinum.
Uppskot III: Broyting í eykainnflutningsgjøldum.
Uppskot IV: Broyting í lóg um minstuløn og stuðul til fiskivinnuna.

I

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broytingar í innflutningsgjøldum

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinri broytingum verða avgjøldini av niðanfyri nevndu vørum broytt soleiðis:

1. Bensin og bensinblandingar:

1.01	Bensin og bensinblandingar. Undantikið er bensin til flogfør	1 litur	2,25 kr.

3. Drykkjuvørur:

Vín:

3.01	Eplavín, sum í mesta lagi inniheldur 9 rúmprosent alkohol	1 litur	10.00 kr.
3.02	Mousserandi vín (champagne)	1 litur	25,00 kr.
3.03	Borðvín (reyðvín og hvítvín)	1 litur	10,00 kr.
3.04	Annað vín	1 litur	18,00 kr.
	Av vørunum, sum nevndar eru í lp. 3.01., 3.02, 3.03 og 3.04 verður aftrat frammanfyri nevndu gjøldum rindað		av virðinum 50%

Spirituosa og spritt:
Brennivín og akvavitt:

3.05	av 50 rúmprocent og undir	1 litur	65,00 kr.

3.06	yvir 50 rúmprocent, men ikki yvir 60 rúmprocent	1 litur	80,00 kr.
3.07	gongur út		
	Aðrar vørur undantikið heilt denaturerað spiritus:		
3.08	av 50 rúmprocent og undir	1 litur	65,00 kr.
3.09	yvir 50 rúmprocent, men ikki yvir 60 rúmprocent	1 litur	80,00 kr.
3.10	gongur út		
	Av vørunum, sum nevndar eru í 1p. nr. 3.05 til 3.09 verður aftrat frammanfyri nevndu gjøldum rindað	av virðinum	50%
	Øl:		
3.11	Øl, sum verður innflutt úr Danmark og sum í lóg nr. 111 frá 1. apríl 1922 § 2, sbr. lóg nr. 221 frá 1. mai 1923 er nevnt:		
	Skattaklassi 1	1 litur	5,00 kr.
	Skattaklassi A	1 litur	10,00 kr.
3.12	Annað øl:		
	yvir 2,25 vektprocent, men ikki yvir 3,70 vektprocent alkohol	1 litur	5,00 kr.
	yvir 3,70 vektprocent, men ikki yvir 4,60 vektprocent alkohol	1 litur	10,00 kr.
7.	*Gummi:*		
7.02	Vulkaniserað dekk, eisini dekk send úr Føroyum til vulkanisering	av virðinum	25%
11.	*Lampur, ravmagnsinnleggingarlutir o.a.*		
11.02	Øll sløg av ravmagnsinnleggingarlutum og partar til teirra, eitt nú avbrótarar (snari-, tumbli-, høvuðs og knivavbrótarar, termostatavbrótarar, oljuavbrótarar o.t.), celluskiftarar, umskiftarar, regulatorar, droslaspolar, mótstøður, fatningar til ravmagnslampur, handlampustativ við innsettum		

fatningum, armatur, isolatorar, kontaktir, kontaktproppar, rosettir, sikringselementir, sikringsproppar og -patrónir, stikkontakt-dósir, transformatorar, innføringsmuffur, krúnmuffur, niplar v.m., tó undantikið innlegg-ingarrør, yvirspunnin tráður, rav-magnsmálarar og lutir, ið viga yvir 10 kg.		av virðinum 30%

17. *Manufaktur*

Í 17.03 verður millum orðini »vatt« og »handagur« sett: »mánasjúkubind«.

25. *Tubbak, tubbaksvørur o.a.*

Sigarir og sigarillos til innkeypspris:

25.01 35 oyru hvør ella undir	100 stk.	65,00 kr.
25.02 yvir 35 oyru, men ikki yvir 65 oyru hvør	100 stk.	75,00 kr.
25.03 yvir 65 oyru, men ikki yvir 80 oyru hvør	100 stk.	85,00 kr.
25.04 yvir 80 oyru hvør	100 stk.	100,00 kr.

Sigarettir:

22.05 allar sigarettir	100 stk.	51,00 kr.
25.06 gongur út		
25.07 gongur út		

Roykitubbak:

25.08 Alt roykitubbak	1 kg.	100,00 kr.

Aðrar vørur:

25.10 Skrátubbak og snús	1 kg.	50,00 kr.

27. *Vognar og onnur akfør, eisini vognsmíðverk*

Bilar og motorhjólhestar, tiltaks- og leysalutir til teirra uttan gummidekk, -ringar og -slangur.

27.01 Motorsúklur og scootarar

Gjaldskyldugt virði:

Undir 12.000,00 kr.	av virðinum	153%
12.000,00 kr. og yvir	av virðinum	190%

27.02 Persónvognar

Gjaldsskyldugt virði:		
undir 10.000 kr.		11.800 kr.
10.000 - 14.999 kr.	11.800 kr. av 10.000 kr. + 143% av restini	
15.000 - 19.999 kr.	18.950 kr. av 15.000 kr. + 158% av restini	
20.000 - og yvir	26.850 kr. av 20.000 kr. + 170% av restini.	

27.06 Last- og vøruvognar:

Undir 2.000 kg. av loyvdari tyngd	av virðinum	80%
yvir 2.000 kg, men ikki yvir 3.500 kg. av loyvdari tyngd fast gjald		12.000 kr.
Yvir 3.500 kg. av loyvdari tyngd fast gjald		10.000 kr.

Sum nýtt 2. stk. verður sett:
Brúkt motorakfør.
Av brúktum akførum, sum innflutt verða, verður gjaldskylduga virðið at áseta eftir meting av bileftirlitinum.
Landsstýrinum verður heimilað við kunngerðum at áseta nærri reglur viðvíkjandi virðismeting av brúktum akførum og um vørubilar.
Núverandi 2. stk. verður 3. stk.
Í § 2 verður sett sum punkt g. Ortopediskir lutir, protesur, hoyritól og glascygu v.m.

Í § 8, seinasta punktum verður í staðin fyri »idnaðarvirkjum« sett: »virkjum«.

Í § 10 verður fylgjandi broyting:

a. Øl, 2,25 vektprocent alkohol og undir	1 litur	2,25 kr.
Yvir 2,25, men ikki yvir 3,70 vektprocent alkohol	1 litur	6,05 kr.
Yvir 3,70, men ikki yvir 4,60 vektprocent alkohol	1 litur	11,05 kr.
b. Mineralvatn, limonada, cintrónvatn o.l. eins og aðrar alkoholfríar drykkjuvørur (t.v.s. sum innihalda í mesta lagi 2,5 rúm-		

procent av alkoholi), sum eru gjørdar úr fruktsaft	l litur	1,05 kr.

§ 2. Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Føroyar og Felagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

1

Forslag
til
lagtingslov om ændring i indførselsafgifter.

§ *1.* I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer ændres afgifterne af nedenforstående varer således:

1.	*Benzin og benzinblandinger:*		
	1.01 Benzin og benzinblandinger, undtaget herfra er benzin til flyvemaskiner	1 liter	2,25 kr.
3.	*Drikkevarer:*		
	Vin:		
	3.01 Æblecider, der indeholder højst 9 rumprocent alkohol	1 liter	10,00 kr.
	3.02 Mousserende vine (champagne)	1 liter	25,00 kr.
	3.03 Bordvine (rødvine og hvidvine)	1 liter	10,00 kr.
	3.04 Anden vin	1 liter	18,00 kr.
	Af de varer, som er nævnt under lb.nr. 3.01, 3.02, 3.03 og 3.04 skal der foruden forannævnte afgifter erlægges af værdien		50%
	Spirituosa og sprit:		
	Brændevin og akvavit:		
	3.05 af rumprocent og derunder	1 liter	65,00 kr.
	3.06 over 50 rumprocent, men ikke over 60 rumprocent	1 liter	80,00 kr.
	3.07 udgår		
	Andre varer undtagen fuldstændig denatureret spiritus:		
	3.08 af 50 rumprocent og derunder	1 liter	65,00 kr.

3.09	over 50 rumprocent, men ikke over 60 rumprocent	1 liter	80,00 kr.
3.10	udgår.		
	Af de varer, som er nævnt under lb.nr. 3.05 til 3.09 skal der foruden forannævnte afgifter svares	af værdien	50 %
	Øl:		
3.11	Øl, der indføres fra Danmark, og som i lov nr. 111 af 1. april 1922, § 2, jfr. lov nr. 221 af 1. maj 1923, § 1, benævnes:		
	Skatteklasse I	1 liter	5,00 kr.
	Skatteklasse A	1 liter	10,00 kr.
3.12	*Andet øl:*		
	Over 2,25 vægtprocent, men ikke over 3,70 vægtprocent alkohol	1 liter	5,00 kr.
	Over 3,70 vægtprocent, men ikke over 4,60 vægtprocent alkohol	1 liter	10,00 kr.
7.	*Gummi.*		
	7.02 Vulkaniserede dæk, også dæk, der sendes fra Færøerne til vulkanisering	af værdien	25 %
11.	*Lamper og elektriske installationsartikler m.m.*		
	11.02 Alle slags elektriske innstallationsartikler samt dele deraf, f.eks. afbrydere (dreje-, tumble-, hoved- og knivafbrydere, termostatafbrydere, olieafbrydere o.lign.), celleskiftere, omskiftere, regulatorer, drosselspoler, modstande, fatninger til elektriske lamper, håndlampestativer med isat fatning, armaturer, isolatorer, kontakter, kontaktpropper, rosetter, sikringselementer, siktingspropper og -patroner, stikkontaktsdåser, transformatorer, indføringsmuffer, kronemuffer, nipler m.m. dog undtagen installationsrør, overspunden tråd, el-målere og artikler, der vejer over 10 kg	af værdien	30 %
17.	*Manufakturvarer.*		
	I 17.03 indsættes »hygiejnebind« mellem ordene »vat« og »bandager«.		

25. *Tobak og tobaksvarer o.a.*		
Cigarer og cigarillos til en indkøbspris af:		
25.01 35 øre pr. stk. eller derunder	100 stk.	65,00 kr.
25.02 over 35 øre, men ikke over 65 øre pr. stk.	100 stk.	75,00 kr.
25.03 over 65 øre, men ikke over 80 øre pr. stk.	100 stk.	85,00 kr.
25.04 over 80 øre pr. stk.	100 stk.	100,00 kr.
Cigaretter:		
25.05 Alle cigaretter	100 stk.	51,00 kr.
25.06 udgår		
25.07 udgår.		
Røgtobak:		
25.08 Røgtobak af enhver art	1 kg.	100,00 kr.
Andre varer:		
25.10 Skråtobak og snustobak	1 kg.	50,00 kr.

27. *Automobiler og andre befordringsmidler, også vognmagerarbejde*		
Automobiler og motorcykler, samt reservedele og tilbehør til sådanne, undtagen gummidæk, -ringe og -slanger.		
27.01 Motorcykler og scootere:		
Afgiftspligtig værdi:		
Under 12.000 kr.	af værdien	153%
Over 12.000 kr.	— —	190%
27.02 Personvogne		
Afgiftspligtig værdi:		
Under 10.000 kr.		11.800 kr.
10.000-14.999 kr.		11.800 kr. af 10.000 kr. + 143% af resten
15.000-19.999 kr.		18.950 kr. af 15.000 kr. + 158% af resten
20.000 og derover		26.850 kr. af 20.000 kr. + 170% af resten
27.06 Last- og varevogne		
Under 2.000 kg tilladt totalvægt	af værdien	80%
Over 2.000 kg, men ikke over 3.500		

kg tilladt totalvægt	fast afgift	12.000 kr.
over 3.500 kg tilladt totalvægt	fast afgift	10.000 kr.

Som nyt stk. 2 indsættes:
Brugte motorkøretøjer.
For brugte motorkøretøjer, der importeres, afsættes den afgiftspligtige værdi i henhold til vurdering, der foretages af automobiltilsynet.
Landsstyret bemyndiges til ved bekendtgørelser at foreskrive nærmere regler angående værdiansættelse af brugte motorkøretøjer og angående varevogne.
Nuværende stk. 2 bliver stk. 3.

I § 2 indsættes som punkt
g. Ortopædiske genstande, proteser, høreapparater og glasøjne m.v.

I § 8, sidste punktum, erstattes ordet »industrivirksomheder« med ordet »virksomheder«.

I § 10 foretages følgende ændring:

a. Øl 2.25 vægtprocent alkohol og under	1 liter	2,25 kr.
Over 2.25 men ikke over 3.70 vægtprocent alkohol	1 liter	6,05 kr.
Over 3.70 men ikke over 4.60 vægtprocent alkohol	1 liter	11,05 kr.
b. Mineralvand, limonade, citronvand, o.dsl. samt andre alkoholfri drikkevarer (d.v.s. med et indhold af højst 2,5 rumprocent alkohol), fremstillet af frugtsaft	1 liter	1,05 kr.

§ 2. De i lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

II

UPPSKOT
TIL
løgtingslóg um broytingar í reglunum um serligt innflutningsgjald.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinri broytingum um serligt innflutningsgjald verður í § 1 í staðin fyri »13%« sett »20%«.

Í § 2 verða gjørdar hesar broytingar:

Punkt 11 verður soljóðandi:
»EDV-tól av tí partinum, sum er yvir 250.000 kr.«
Punkt 12 verður soljóðandi:
»Maskinur til handverk og ídnað av tí partinum, sum er yvir 10.000 kr.«
Punkt 13 verður soljóðandi:
»Maskinur til landbúnaðin av tí partinum, sum er yvir 5.000 kr.«
Punkt 15 verður soljóðandi:
»Eftir umsókn kann landsstýrið endurrinda innflutningsgjaldið av navigatións-, leitingar- og kommunikatiónsútgerð, skipsmotorum, ljósmotorum, egningarmaskinum, skrúvudysum, kraftblokkum, trolspølum, snurpispølum og øðrum skipsspølum, treytað av at lutirnir ikki skulu nýtast til nýbygningar, og virðið ikki er undir 10.000 kr.«

§ *2.* Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Føroyar og Felagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

II

FORSLAG
TIL
lagtingslov om ændringer i reglerne om særlig indførselsafgift.

§ *1.* I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer ændres i § 1 »13%« til »20%«.
I § 2 foretages følgende ændringer:
Punkt 11 bliver sålydende:
»EDB-maskiner for den del af værdien, der overstiger 250.000 kr.«
Punkt 12 bliver sålydende:
»Maskiner til håndværk og industri for den værdi, der overstiger 10.000 kr.«
Punkt 13 bliver sålydende:
»Maskiner til landbrug for den værdi, der overstiger 5.000 kr.«

Punkt 15 bliver sålydende:

»Landsstyret kan efter ansøgning refundere indførselsafgiften af navigations-, eftersøgnings- og kommunikationsudstyr, skibsmotorer og lystmotorer, agnmaskiner, skruedyser, kraftblokke, trawlspil, snurpespil og andre skibsspil på betingelse af at delene ikke skal benyttes til nybygninger og værdien ikke er under 10.000 kr.«

§ 2. De i lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

III

UPPSKOT

TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

§ *1*. Í § 1 í løgtingslóg nr. 17 frá 7. mars 1980 verður »7%« broytt til »5%«.

§ *2*. Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Føroyar og Fclagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ *3*. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

III

FORSLAG

TIL

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstraindførselsafgift.

§ *1*. I § 1 i lagtingslov nr. 17 af 7. marts 1980 ændres »7%« til »5%«.

§ *2*. De i lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ *3*. Denne lov træder i kraft straks.

IV

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd hesa broyting:

Í § 5 g verður í staðin fyri »9 oyru/kg« sett »15 oyru/kg«.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

IV

Forslag
til
lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foreslås følgende ændring:

I § 5 g ændres »9 øre/kg« til »15 øre/kg«.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Endaligu tølini fyri roknskap landskassans fíggjarárini 1979/80 og 1980/81 eru hall uppá ávikavist 19.230.000 kr.
og 21.868.000 kr.
ella tilsamans 41.098.000 kr.

Til at rinda hesi hall og til at leggja upp fyri verða løgd fram lógaruppskotini
I Broyting í innflutningsgjøldum
II Broyting í serliga innflutningsgjaldinum
III Broyting í cykainnflutningsgjaldinum
IV Broyting í lóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

ad I: *Benzin* verður hækkað við 0,92 kr. pr. litur og við mettari nøgd 17,4 mió. litrar gevur hetta umleið 16 mió. kr. *Sigarettir* verða hækkaðar í tollinum við 0,05 kr. pr. stk. og við nýtslu 55 mió. stk. gevur hetta 2.750.000 kr. *Rúsdrekka* verður hækkað soleiðis at úrtøkan verður umleið *2.285.000 kr.* Borðvín gevur *775.000 kr.*

Innflutt *øl* fær tollhækking uppá *325.000 kr.*, meðan hækkað framleiðslugjøld væntast at geva 3.100.000 kr.

Vognar og onnur akfør *2.000.000 kr.*

Viðvíkjandi *motorsúklum* og *scootarum* er gjørd tann broyting, at er virðið undir 12.000 kr., er gjaldið 153% av virðinum, meðan fyri virði meiri enn 12.000 kr. er avgjaldið 190%. Fyri *persónvognar* eru virðistølini førd ajour og dýrasta tollingin er, tá virðið er kr. 20.000 og yvir: 26.850 kr. av 20.000 kr. + 170% av restini.

Fyri *last- og vøruvognar* er tann broyting, at er vektin undir 2.000 kg loyvd totalvekt, er gjaldið 80% av virðinum, meðan við vekt yvir 2.000 kg, men ikki yvir 3.500 kg er fast gjald 12.000 kr. og yvir 3.500 kg fast gjald 10.000 kr. Á henda hátt verður roknað við, at vørubilar verða brúktir til vøruflutning og ikki til persónkoyring. Til tess at tálma vøruvognsnýtsluni hjá privatum, fer landsstýrið at áseta kunngerð hesum viðvíkjandi.

Fyri lastbilar er talan um minking av gjaldinum, men verður hetta í ávíst mát fingið aftur við vektagjøldum, sum verða endurskoðað í nýggjari lóggávu, sum landsstýrið leggur uppskot fram í hesi tingsetu.

Skotið er upp, at brúkt akfør fáa serreglur í tolllógini. Spurningurin er ikki lættur at loysa, men uppskotið er, at gjaldskylduga virðið verður at áseta eftir meting av bileftirlitinum, og at landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglugerð um hetta.

Undir punkt 7 er sett nýggj regla um dekk, send av landinum til vulkaniseringar. Vulkaniseringarvirki er í Føroyum.

Tað hevur vist seg torført at umsita teir tveir bólkarnar undir pkt. 11: Lampur og ravmagnsinnleggingarlutir v.m. við tollsatsum ávikavist 25% og 30%. Skotið verður upp, at báðir bólkar verða tollaðir við 30%.

Um ídnaðarvirki í § 8, 3. stk. er ætlanin, at lógarreglan kemur betri í samsvar við galdandi praksis. Landsstýrið vil senda fíggjarnevnd løgtingsins uppskot til reglugerð viðvíkjandi umsiting av hesum.

Ad 11: Metí verður, at fyri hvørt procentið, ið 13%-gjaldið verður hækkað, koma góðar 5 mió. kr. inn. 7% hækkanin er mett at geva 36 mió. kr.

Galdandi regla um EDV-virki er ikki longur tíðarhóskandi. Framburðurin á hesum øki ger eina lógarbroyting neyðuga. Markið her er hækkað til 250.000 kr., meðan hini markini viðvíkjandi ídnaði, handverki, landbúnaði og skipsluttum ikki er broytt. Broytingin í punkt 15 hevur leingi verið neyðug og kann roknast við, at henda regla, um hon verður varðveitt framyvir, má ajourførast við nýggjum teknikki.

Ad 111: Lækkingin av cykainnflutningsgjaldinum frá 7 niður í 5% væntast at geva 15 mió. kr. minni í tolli.

Ad IV: Hækking í § 5 g úr 9 oyru upp í 15 oyru er ein regulering í samsvar við uppskot í viðvíkjandi bensintolli.

Landsstýrið kannar møguleikarnar fyri partvísa kompensatión fyri tær avgjaldshækkingar, ið talan er um við at lætta í beinleiðis skattinum fyri láginntøkurnar.

Í sambund við hækkingina av bensingjaldinum kann vera nevnt, at landsstýrið er sinnað til frá og við komandi álíkning at fáa flutningsfrádrátt aftur við í skattalógina.

Nevnast skal, at tað er ætlan landsstýrisins at avmarka tann gjaldfría innflutning, ið ferðandi hava, av brennivíni, víni og sigarettum.

At enda skal viðmerkjast, at í løgtingsmáli nr. 27/1980 (vetrarting): Figging av arbeiðinum ímóti alkoholmisnýtslu — fyribyrging og hjálp, varð samtykt, at landsstýrið skal leggja fyri løgtingið lóg um eitt eykagjald uppá 0,05 kr. pr. vektprocent alkohol á hvørja standard fløsku av øli, víni og rúsdrekka, tó undantikið ljóst øl.

Landsstýrið fer í hesi tingsetu at seta fram nevnda lógaruppskot.

Samlaða úrtøkan av uppskotnu hækkingunum verður:

Tollur:	Bensin	16.000.000 kr.
	Borðvín	375.000 kr.
		400.000 kr.
	Rúsdrekka	2.225.000 kr.
	Heitvín	200.000 kr.
	Mouss. vín	10.000 kr.
	Sigarettir	2.750.000 kr.
	Tubbakk	250.000 kr.
	Cigarir	250.000 kr.
	Skrá og snús	200.000 kr.
	ØL I	125.000 kr.
	Øl A	200.000 kr.
Framleiðslugjøld:	Øl — ljóst	1.400.000 kr.
	Øl I	400.000 kr.
	Øl A	1.300.000 kr.
	Mineralvatn	400.000 kr.
Tollur:	Bilar	2.000.000 kr.
	§ 2.11, 12, 13 og 15	
	Dekk	
	Lampur v.m.	1.100.000 kr.
	+ í 20%	+ 36.000.000 kr.
	- í 5%	— 15.000.000 kr.
		50.585.000 kr.

Formaðurin bað um frávik at viðgera tingmálini 13, 14 og 15. Hetta varð samtykt við navnakalli.

Ja atkvøddu Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Sverre Midjord, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

1. viðgerð sama dag. Eftir atkvøðugreiðslu varð tað beint í figgjarnevndina, sum 7. sept. legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð sama dag beint í figgjarnevndina.

Málið varð viðgjørt á fundi í figgjarnevndini sama dag, og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og triggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

ad I 1) Í § 1, 2. stk. verður í staðin fyri »bileftirlitinum« sett: »metingarmonnum Tryggingarsambandsins«.

2) Í § 1 viðvikjandi § 10 verður framleiðslugjaldið fyri ljóst øl sett til kr. 1,90 í staðin fyri kr. 2,25 pr. litur.

ad II 3) Í § 1 punkt 15 verður broytt soleiðis:

»..... navigatións-, siglingar- og kommunikatiónsútgerð....« tá t.d. róðurmaskinur skulu umfatast av reglini.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot
til

uppskot landsstýrisins:

Ad I:

1) Í § 1, 2. stk. verður í staðin fyri »bileftirlitinum« sett »metingarmonnum Tryggingarsambandsins«.

1) I § 1, stk. 2 indsættes i stedet for »automobiltilsynet« ordene »Tryggingarsambandets vurderingsmænd«.

2) Í § 1 verður í § 10 viðvikjandi øli »2,25 vektprocent alkohol og

2) I § 1 foretages følgende ændring vedrørende § 10 angående øl »2,25

undir«, í staðin fyri »2,25 kr.« sett »1,90 kr.«.

Ad II:

3) § 1, punkt 15 verður broytt soleiðis at millum orðini »navigatións-,« og »leitingar-,« verður sett »siglingar-,«.

vægtprocent alkohol og under« i stedet for »2,25 kr.« indsættes »1,90 kr.«.

3) § 1, punkt 15 ændres således, at mellem ordene »navigations-,« og »eftersøgnings-« indsættes ordet »besejlings-,«.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) førir fram, at grundgevingarnar hjá landsstýrinum fyri inntøkulógaruppskotunum eru rangar og villleiðandi. T.d. verður sagt í viðmerkingunum, at tær inntøkur, sum landskassin fær av hesum lógum, skulu nýtast til at rinda hallið hjá landskassanum fyri fíggjarárini 1979/80 og 1980/81. Samlaða hallið hjá landskassanum fyri hesi bæði árini er umleið 41,1 mió. kr.

Inntøkulógaruppskotini eru mett at geva landskassanum 50,6 mió. kr. um árið. Talan er um varandi inntøkulógir, ið sostatt fara at geva landskassanum eina meirinntøku framyvir uppá umleið 50 mió. kr. árliga. Var talan veruliga um at fíggja hallið hjá landskassanum uppá umleið 41,1 mió. kr. í áður nevndu tveimum fíggjarárum, vildi tað verið meira náttúrligt at gjørt hetta við tíðaravmarkaðum inntøkulógum, ið vóru meira sosialt avvegaðar, sum t.d. við eykaskatti á háinntøkum og við eykaskatti á bankarnar og onnur partafeløg.

Sum tað eisini varð undirstrikað av samgongumonnum á tingi undir umrøðuni av hesum máli, og sum long nevnt her, eru grundgevingarnar hjá landsstýrinum fyri hesum inntøkulógaruppskotum beinleiðis rangar og villleiðandi. Við hesum inntøkulógaruppskotum er talan heldur um at bøta um gjaldføri hjá landskassanum og at bøta um inntøkumøguleikarnar hjá tí almenna í komandi árum, meðan hallið hjá landskassanum bert verður nýtt sum umbering.

Javnaðarflokkurin kann ikki taka undir við:

1. At framdar verða varandi inntøkulógir við tí grundgeving at fíggja tvær eykafíggjarlógir.
2. At varandi inntøkulógir verða framdar fyri at loysa fyribils likviditetstrupulleikar hjá landskassanum.
3. At lagt verður upp fyri, sum tað eitur í viðmerkingunum hjá landsstýrinum, uttan at fáa kunnleika tit, hvat hesin peningur ætlandi skal nýtast til.
4. At tað almenna útvegar sær inntøkur við inntøkulógum, ið venda tann tunga endan niður eftir, sum fyriliggjandi inntøkulógaruppskot landsstýrisins gera.

Javnaðarflokkurin tekur undir við einum virknum vinnulivspolitikki, at tað almenna tekur lut í vinnulívinum, vist verður til løgtingsmál um studning til svartkjaftaveiðu, og tekur undir við, at tað almenna t.d. stuðlar svartkjaftafiskiskapi við tí fyri eyga at framleiða hendan fisk til matna, og er javnaðarflokkurin eisini fúsur til at fíggja hendan politikk við at útvega tí almenna inntøkur,

sum ikki raka láginntøkurnar, tær barnariku familjurnar og pensjónistarnar, men verða bornar av teimum herðum í samfelagnum, ið veruliga hava figgjarliga orku til tess.

Í figgjarnevndini hevur javnaðarflokkurin boðið sær til at samarbeiða um slíkar loysnir sum hesar, men er hetta sópað av borðinum. Flokkurin er greiður yvir, at meirilutin á tingi vil fremja fyriliggjandi inntøkulógaruppskot landsstýrisins í óbroyttum líki, og at hetta fer at raka láginntøkurnar, tær barnariku familjurnar og pensónistarnar serliga hart. Fara handilsliðini so eisini at rokna sær vinning av hesum hækkingum í innflutningsgjøldunum, fer hetta sum vera man at raka somu samfelagsbólkar tvífalt so hart.

Tað er eftir javnaðarfloksins meting heilt eyðsæð, at avleiðingarnar av eini slíkari gongd eru serliga álvarsamar, nú landsstýrissamgongan hevur noktað og framvegis noktar fyri at seta tær avtalaðu og hart tiltrongdu pensjónshækkingar í gildi.

Tá so eisini verður havt í huga, at føroysku fakfeløgini fyri stuttum hava gjørt nýggjar lønarsáttmálar í tí áliti, at ongar avgjaldshækkingar fóru at verða framdar, er púra greitt, at uppskot landsstýrisins fara at raka hvørt einasta løntakara-húsarhald so meint, at allur vunnin lønarbati hvørvur.

Fyri at bøta um tær verstu avleiðingarnar, ifall at landsstýrisuppskotini verða samtykt, loyvir minnilutin sær tí at seta fram soljóðandi

U p p s k o t
til

løgtingslóg um pris- og vinningssteðg.

§ *1.* Ásettur verður pris- og vinningsstegður fyri allar vørur í tíðarskeiðinum 8. september 1981 til 31. mars 1982.

§ *2.* Í hesum tíðarskeiði kunnu prishækkanir ikki fara fram við undantak av teimum hækkingum, ið standast av gjøldum til tað almenna, men má vinningur ikki roknast av hesum.

§ *3.* Tó kann Prísráð Føroya eftir umsókn geva loyvi til prishækkingar, tá fullgott prógv er fyri at so má verða.

lagtingslov om pris- og avancestop.

§ *1.* Pris- og avancestop træder i kraft for alle varer i perioden 8. september 1981 indtil 31. mars 1982.

§ *2.* I dette tidsrum kan der ikke foretages prisforhøjelser med undtagelse af de forhøjelser, der er forårsaget af afgifter til det offentlige, men fortjeneste må ikke beregnes af disse.

§ *3.* Dog kan Færøernes Prisråd efter ansøgning give tilladelse til prisforhøjelser, såfremt tilfredsstillende bevis føres, for at dette er nødvendingt.

§ 4. Í reglugerð, sum skal góðkennast av figgjarnevnd Føroya løgtings, ásetir Føroya landsstýri nærri reglur fyri hvussu hendan lóg verður at umsita.

§ 4. I reglement, der skal godkendes af Lagtingets finansudvalg, fastsætter Færøernes landsstyre nærmere regler for, hvordan denne lov skal administreres.

Minnilutin (Erlendur Patursson) viðmerkir:

Í viðmerkingum landsstýrisins til hesi inntøkulógaruppskot verður sagt, at inntøkurnar av teimum skulu nýtast til at rinda hallið á landsroknskapinum 1979/80 og 1980/81 og til at leggja upp fyri. Hallið á teimum báðum landsroknskapunum er uppgjørt til 41,1 mió. kr., meðan hesi inntøkulógaruppskot eru mett at geva samanlagt 50,6 mió. kr.

Um so var, at ætlanin við hesum inntøkulógum var at rinda hetta hall, átti gildi teirra at vera tíðaravmarkað, t.d. til eitt ár, men so er ikki. Tær skulu tvørtur í móti hava framhaldandi gildi. Endamálið er tí ikki tað, sum landsstýrið upplýsir í viðmerkingum sínum.

Minnilutin átalar, at landsstýrið við hesum rongu upplýsingum sínum reynir at villleiða løgting og løgtingsmenn.

Eftir teimum upplýsingum, sum tøkar eru, er tað harnæst greitt, at tað er púra óneyðugt at seta hesar ella aðrar inntøkulógir í gildi nú til tess at rinda hallið á landsroknskapinum 1979/80 og 1980/81. Her er í fyrsta lagi at nevna, at skattaeftirstøður landskassans í dag liggja um 90-100 mió. kr.

Um so var, at bert helmingurin av hesum eftirstøðum fekst inn, er her longu ríviligt av peningi til at gjalda fyrrnevnda hall.

Harnæst er at nevna, at enn eru eftir o.u. 20 mió. kr., ið kunnu fáast sum likviditetslán í danska tjóðarbankanum.

Í triðja lagi meta menn, at í verandi fíggjarári verður eitt ríviligt rakstraravlop — o.u. 40-60 mió. kr.

Niðurstøðan má tí vera tann, at hesar inntøkulógir eru púra ógrundaðar og óneyðugar.

Longu av hesum grundum má minnilutin mæla frá at samtykkja hesar lógir.

Harafturat má minnilutin harðliga átala, at løgtingið so í bráðskundi og uttan at møguleiki hevur verið til nakra sakliga veruleikaviðgerð skal samtykkja hesar inntøkulógir.

Eisini av hesi grund kann minnilutin ikki mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotini.

Loksins, men ikki minst, fer minnilutin at benda á, at hesi inntøkulógaruppskot, verða tey samtykt, koma at gera býtið av skattabyrðunum upp aftur órættvísari,ójavnari og høpisleysari enn tað er longu framman undan, soleiðis at hin tungi endi kemur at venda niður eftir við upp aftur størri tyngd enn higartil.

Uppskotini rokna við sama innflutningi sum nú. Tey koma tí einki at bøta um

handils- (og gjalds-) javnað okkara sum so nógv verður umrøddur í løgmansrøðuni. Her verður tí eingin bati í hesum umrødda skeivleika.

Yvirhøvur rokna uppskotini við sonn nýtslu av teimum vørum, sum nevndar verða. Hetta týðir tað, at miðalútreiðslurnar pr. fólk til hesar vørur koma at vaksa 1.200 kr. um árið.

So mikið minni verður til avlops til at gjalda aðrar útreiðslur við: húsaleigu, hita, ljós, klæði og mangt, mangt annað — og skatt, har í millum møguliga skattaeftirstøður, soleiðis at tað verður upp aftur torførari at fáa hesar inn enn longu framman undan.

Av øllum hesum er tað greitt, at endamálið við hesum lógaruppskotum er als ikki tað, sum landsstýrið nevnir í viðmerkingum sínum, men eitthvørt tað at fremja árás á tey inntøkuveiku í samfelagnum og eira teimum inntøkusterku og soleiðis gera skattaskipan okkara upp aftur órættvísari, ójavnari og høpisleysari enn hon longu er.

Av øllum teimum grundum, ið her hava verið nevndar, má minnilutin mæla frá at samtykkja inntøkulógaruppskot landsstýrisins.

Minnilutin sær væl tann møguleika, at neyðugt kann koma at verða at økja inntøkur landskassans. Men hesin møguligi tørvur er als ikki til staðar í dag. Men, annað hvørt hann er til staðar ella ikki, eiga vit nú beinan vegin at taka upp miðvist starv her á løgtingi við tiltøkum til tess at fáa rættvísari býti av skattabyrðunum. Tað má standa øllum løgtingsmonnum greitt, at hesin misjavni og hetta himinrópandi órættvísi kann ikki halda fram, uttan at samfelagslívið fær siðferðisliga slagsíðu. Men hetta er ikki løtuverk og kann als ikki gerast eftir teimum báðum døgunum, ið løgtinginum hevur verið skamtað til viðgerðina av hesum málum. Minnilutin hevur tí í hesi syftu eina ítøkiligt uppskot at bera fram.

Um bøtast skal um hetta, noyðast vit at taka øll hesi málsøki — skattamál, tollmál og aðrar gjaldsskipanir — til viðgerðar frá botni, og setir tí minnilutin fram hetta

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið velur eina 5 manna millumtinganevnd við tí verkevni at endurskoða alla landsins skatta-, toll- og gjaldskipan og at gera uppskot um slíkar broytingar í hesi skipan, at vissa fæst fyri, *at* allar inntøkur verða taldar fram fyri í skattamyndugleikunum, *at* inntøkurnar verða skattaðar stigvist eftir inntøkuuppliædd og gjaldorku, *at* lætt verður um skattabyrðarnar á teimum inntøku- og gjaldveiku, *at* sum minst av tolli og innflutningsgjøldum verður lagt á neyðsynjarvørur almennings og framleiðsluvørur vinnulívsins.

Nevndin tekur sær serkøna og aðra hjálp eftir tørvi og skal leggja fram uppskot sítt í seinasta lagi á ólavsøku 1982.

Viðvikjandi málinum um kelduskatt vísir minnilutin á kelduskattauppskot tjóðveldisflokksins í tingsetuni 1960.

Ein minnilutt (Adolf V. Hansen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins av fylgjandi orsøkum:

Lógaruppskotini koma ikki at geva meiri pening í landskassan, men bert at broyta peningagongdina.

Tey peningavcikaru verða harðast rakt, og er talan bert um at síla peningin yvir á tær hendur, har nokk er framman undan.

At tey, ið skylda skatt, og sostatt eru orsøkin til likviditetstrupulleikarnar framhaldandi sleppa at skylda skatt.

At ein positiv útjavnan av samfelagságóðanum nú má fara fram.

At skattatiltøk sum varðveita sparipeningin í landinum mugu setast í verk og

At skattaeftirstøðurnar á ein rættvísan og metniskjaligan hátt mugu fáast inn.

Minnilutin setir til fram uppskot um at seta í verk eykaskatt á háinntøkurnar og harvið varðveita meira av sparipeninginum í landinum, og uppskot um nýggjan hátt at fáa skattaeftirstøðurnar inn fyri at røttu viðkomandi skulu gjalda.

Hesin háttur skal gera tað ógjørligt hjá skattaskyldara at sleppa undan afturhaldsavgreiðsluni við at skifta lánstovn, kundar ella arbeiðsplass.

Sum er kunnu bert skattaeftirstøðu frá løntakarum afturhaldast. Tankin við broytingini av § 83 í skattalógini er, at eisini frá øðrum skal kunna haldast aftur peningur fyri skattaeftirstøður, soleiðis at skilja, at hevur t.d. ein handil keypt frá eini heilsølu ella øðrum, og heilsølan skyldar skatt, skal handilin hava skyldu at afturhalda 10% av rokningini. Ella um ein vøruinnflytari, sum skyldar skatt, skal senda pening av landinum, skal bankin/lánstovnurin halda aftur við 10% av flytingini, eisini um kekkur verður nýttur.

Broytingin í § 83 í skattalógini ber í sær, at myndugleikarnir gera og útsenda »blankolistar«, t.v.s. listar yvir øll tey, ið *ikki* skylda skatt. Tey, ið umfatað eru av 1. stk. í § 83 í skattalógini, hava skyldu at halda pening aftur fyri skattaeftirstøður frá øllum, sum ikki standa á »blankolistanum«.

Peningurin, ið er innkomin av nógv, ti onkur er uppundankomin við eftirstøðunum, inntil næsti »blankolisti« kemur út, verður uttan ihald at senda skattgjaldaranum aftur.

Minnilutin setir fram uppskot um avtøku av 7% eykainnflutningsgjaldinum fyri

at lætta um hjá tí peningaveikara, fyri at fáa eina byrjan á omanfyrinevnda útjavning av samfelagságóðanum og fyri at gera okkara smáidnað betur kappingarføran.

Somuleiðis setir minnilutin fram uppskot til samtyktar um eina meiri rættvísa fordeiling av likviditetsørvinum í landskassanum. Tað er ikki í lagi, at bert fiskivinnan skal bíða eftir peningi, tá hann manglar í landskassanum, tí tað er ikki fiskimaðurin, sum skal ansa eftir, at skattur kemur inn, og tí er eingin meining í, at hann skal vera kreditor hjá øllum fastløntum, iroknað løgtings- og landsstýrismenn.

Eykaskatturin av háinntøkunum + tað, ið kemur meiri inn av skattaeftirstøðunum — 7% eykainnflutningsgjaldið gevur árliga landskassanum meira enn tær 50 mió. kr., sum landsstýrið við sínum uppskotum hevur biðið Løgtingið um heimild til at fáa til vega.

Vísandi til tað, ið frammanfyri er ført fram, setir minnilutin (Adolf Hansen) fram soljóðandi

uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri tingið beinanvegin uppskot til lóg um eykaskatt av háinntøkum. Eykaskatturin verður at rinda av inntøkuni, áðrenn avskrivingar við:

15% av inntøku ímillum	kr.	500.000 og kr.	1.000.000
20% av inntøku ímillum	kr.	1.000.000 og kr.	5.000.000
25% av inntøku ímillum	kr.	5.000.000 og kr.	10.000.000
30% av inntøku yvir	kr.	10.000.000	

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verður skoytt uppí § 83, 1. stk.: »Somu skyldu hava handlar, heilsølur, lánstovnar, tryggingarfeløg v.m.«

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer.

§ *1.* I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat tilføjes til § 83, stk. 1:

»Den samme forpligtelse påhviler forretninger, engrosvirksomhe-

og sum nýtt 2. stk. í § 83, verður sett:

»*2. stk.* Teimum, ið hava skyldu at afturhalda skatt sambært 1. stk. sendir skattadeildin ein ájourførdan lista 2 ferðir um árið yvir allar teir skattgjaldarar, ið ikki skylda skatt. Teir, ið skylduna hava at afturhalda skatt, skulu halda hann aftur sambært hesa talvu, um ikki annað er fyriseti av landsstýrinum:

Fylgjandi skal verða afturhildið í løni hjá løntakara, um inntøkan er:

	pr. dag (1 dagur)	pr. dag (5 dagar)	pr. mánað (21,5 dagar)	pr. ár (258 dagar)	%
Undir	150	750	3.225	38.700	15
Frá/til	200	1.000	4.300	51.600	25
" "	250	1.250	5.375	64.500	35
" "	300	1.500	6.450	77.400	42
" "	350	1.750	7.525	90.300	44
" "	400	2.000	8.600	103.200	46
" "	500	2.500	10.750	129.000	48
" "	600	3.000	12.900	154.800	50
" "	800	4.000	17.200	206.400	55
" "	1.000	5.000	21.500	258.000	60
" "	1.500	7.500	32.250	387.000	70
yvir	2.000	10.000	43.000	516.000	75

Frá øðrum enn løntakarum verður afturhildið 10% av umsetninginum.

Núverandi 2. stk. í § 83 gongur út.

§ *2.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

forsikringsselskaber m.v.«

og som nyt stk. 2 i § 83 indsættes:

»*Stk. 2.* Til dem, der har pligt til at indeholde skat i henhold til stk. 1 fremsender Skattadeildin en ájourført liste 2 gange årlig over alle de skatteydere, der ikke skylder skat. De, der er forpligtet til at indeholde skat, skal foretage indeholdelsen i henhold til denne tabel, såfremt ikke andre regler er forordnet af landsstyret:

Følgende skal indeholdes i lønmodtagerens løn, såfremt indkomsten er:

Fra andre end lønmodtagere indeholdes 10% af omsætningen.

Nuværende stk. 2 i § 83 udgår.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

III

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald.

§ *1.* Løgtingslóg nr. 17 frá 7. mars 1980 um eykainnflutningsgjald fer úr gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstraindførselsafgift.

§ *1.* Lagtingslov nr. 17 af 7. mars 1980 om ekstraindførselsafgift træder ud af kraft straks.

IV

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Álagt verður landsstýrinum at halda aftur 50% av øllum lønum, ið goldnar verða um landskassan til landsstýrismenn, løgtingsmenn, skrivstovustjórar, fulltrúar, starvsfólk og lærarar, inntil skuldin pro rata til hesar bólkar er eins stór og skuldin er hjá lønjavningargrunni skipsfiskimanna til fiski- og útróðrarmenn, og skal henda javnvág í framtíðini verða óbroytt.

2. viðgerð 7. september. Eftir uppskoti varð málið aftur beint í figgjarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Álitið frá figgjarnevndini var lagt fram á fundi í løgtinginum 7. september 1981 kl. 9.

Eftir áheitan frá løgtingsmanninum Peturi Reinert varð málið afturbeint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur á fundi tann 7. september 1981 kl. 13.30 viðgjørt málið, og verður álitið saman við nýggjum viðmerkingum frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni sent tinginum aftur.

Ove Mikkelsen hevur hesar viðmerkingar:

ad 27.06:

Til mótmælisskriv frá Martini Dam Jacobsen, bilumboð, Tórshavn, metir Tjóðveldisflokkurin, at vandi er fyri, at innflutmingurin av brúktum bilum úr USA via Svøriki fer at vinda uppá seg. USA-bilarnir hóska illa í Føroyum og brúka nógv meiri bensin enn vanligir bilar.

ad 7: Á figgjarnevndarfundinum 7. september 1981 varð upplýst, at gummi til vulkanisering av dekkum eins og bobbies og gummi til gerð av bobbies er undantikið serliga innflutningsgjaldinum.
ad 11: Fleiri av hesum el-lutum eru nýttir á SEV-virkinum, og hvørja ávirkan hesar tollhækkingar fáa á SEV-prisin, fekst eingi svar uppá.

Upplýst varð, at pakkitilfar til flakavirkini er undantikið, meðan pakkitilfar til mjólkarvirkir og annan iðnað fær toll.

Framhaldandi 2. viðgerð 8. september. Málið varð aftur beint í figgjarnevndina, sum sama dag á seinni fundi legði fram soljóðandi

ÁLIT
III

Álit II frá figgjarnevndini varð lagt fram á fundi í Løgtinginum 8. september 1981 kl. 10.

Eftir áheitan frá løgtingsmanni varð málið beint aftur til figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur á fundi tann 8. september 1981 kl. 11.30 viðgjørt málið, og verður álitið við niðanfyristandandi viðmerkingum frá Jørgin Thomsen, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen sent tinginum aftur.

Minnilutin (Jørgin Thomsen) hevur hesar viðmerkingar:

1. Javnaðarflokkurin heldur fast við tað, sum hann hevur ført fram í ti uppruna-liga álitinum.

2. Flokkurin heldur fast við uppskot sítt um pris- og vinningsstøðg.

Verða inntøkulógaruppskotini samtykt, raka tey tey flestu húsarhaldini í landinum, serliga lønarstættirnar. Vísandi til tey mótmælisskriv, ið komin eru frá vinnufeløgunum, heldur flokkurin tað verða rímuligt, at figgjarnevndin tekur ein fund við umboð fyri hesi feløg.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) førir fram:

1. Mælt verður landsstýrinum til at broyta viðmerkingarnar samsvarandi samleikanum, soleiðis at hesi orð: »Til at rinda hesi hall og til at leggja uppí verða løgd fram lógaruppskotini:
   1. Broyting í innflutningsgjøldum.
   2. " " serliga innflutningsgjaldintum.
   3. " " eykainnflutningsgjaldinum.«
   verða strikað.

2. Um hesi inntøkulógaruppskot verða samtykt, setir minnilutin uppskot til samtyktar fram:

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR:

I. Álagt verður landsstýrinum beinanvegin at fáa i lag gjaldsskipan viðvikjandi øllum skattaeftirstøðum.

II. Álagt verður landsstýrinum sum alra fyrst at leggja fyri tingið uppskot um skattalætta fyri allar láginntøkur. Skattalætta, sum svarar til tær eykabyrður sum standast av hesum inntøkulógum.

Og hesar broytingar í áðurnevnda uppskoti landsstýrisins: At § 3 i øllum hesum lógaruppskotum verður soleiðis orðað: Henda lóg fær gildi frá 10.9.1981 til 9.9.1982.

Denne lov er gældende fra 10.9.1981 indtil 9.9.1982.

Í aðrar mátar mælir minnilutin til at samtykkja upprunaliga uppskot minnilutans.

Av tí, at tað her frá tingsins røðarapalli undir viðgerðini av hesum løgtingsmáli um eykainntøkulógir, hevur verið framført, at grundgeving landsstýrisins til hesar eykabyrður á Føroya fólk eru óneyðugar, ikki hevur verið afturvíst av nøkrum í samgonguni, og at orð sum falsum og bluff eisini hava verið nýtt, uttan at hava verið afturvíst, má tað ásannast, at so er, nevniliga at hettar er óneyðugt.

So seint sum í gjár segði løgmaður her frá pallinum, at ráfiskagrunnurin hevði ovmikið av tøkum peningi.

At fíggjarmálaráðharrin so nú á fíggjarnevndarfundi sigur nakað annað, vísir skilliga, at í samgonguni veit ikki vinstra hond, hvat høgra ger.

Hesar so statt óneyðugu eyka tollógir koma at nerva hvørt húsarhald í Føroyum, sjálvandi eina mest tey lægstløntu, og er tí eisini komið mótmæli frá øllum fakfeløgum í Føroyum. Andstøðan kann ikki skilja hettar púra óneyðuga lógaruppskot annarleiðis enn at hettar skal brúkast sum reint propagandamál, soleiðis at Føroya fólk nú skal bløða — óneyðugt —, so at sitandi samgonga kann siga fyri Føroya fólki, at her siggja tit rokningina fyri tað óskil, sum fyrrverandi landsstýri førdi landið út í.

Tí mótmælir minnilutin harðliga, at hesar óneyðugu lógir koma í gildi, eins og at um veruliga tørvur var á hesum máli, so áttu aðrir útvegir at verði tøkir. M.a., um at fáa eina gjaldsskipan viðvikjandi øllum skattaeftirstøðum, eins og um hesar lógir verða viðtiknar ikki skulu koma at galda í óavmarkaða tíð framyvir.

Minnilutin (Adolf Hansen) førir fram:

Undir viðgerðini av løgmansrøðuni nevndi Olaf Olsen, landsstýrismaður, at ráfiskagrunnurin varð byrjaður at gjalda til svartkjaft til matna.

Undir viðgerðini av tingmáli nr. 14/1981: Ymisk inntøkulógaruppskot váttaði

løgmaður hetta og segði, at so nógv var í ráfiskagrunninum, at stýrið fyri grunnin hevði biðið landsstýrið um loyvi at nýta henda pening.

Somuleiðis upplýsti løgmaður undir viðgerðini av tingmáli nr. 14/1981, at tann upphædd, ið gjaldast skal til svartkjaft til ídnað, sambært tingmál nr. 15/1981, skal av § 16 av teirri konto, sum eitur: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

Eingi verður upplýst um á hvørja konto inntøkurnar, ið ætlaðar eru at koma inn, sambært tingmál nr. 14/1981, skulu fara á.

Hóast takast kann undir við bæði lanka og uppskoti um at stuðla fi nýggju svartkjaftavinnuni, bæði til mama og ídnað, so kann ikki takast undir við, at peningur verður tikin frá aðrari, figgjarliga hart kroystari vinnu.

Tað er eingi órímiligt í at hækka játtanina til § 16 við einum parti av ti, landsstýrið væntar at fáa inn við nýggju inntøkulógunum.

Vitandi, at feskfiskaflotin siglur við halli orsakað av ov lágum fiskaprísum í mun til útreiðslukostnaðin, og at ráfiskagrunnurin hevur ov nógv av peningi (flýtur yvir sambært løgmann), má minstakravið vera, at hesin flotin ikki fær nakra realprislækking, og at hann fær eina kompensatión fyri tað, hann hevur fingið ov lítið, tað ið farið er av hesum figgjarárinum.

Somuleiðis er tað órættvist, at løntakarin omanà tað reallønartap, hann hevur í prístalsreguleringini, skal fara so munandi niður í realløn, orsakað av inntøkulógunum í tingmáli nr. 14/1981. At hesin eisini fær eina kompensatión er bert menniskjansligt.

Út frá hesum setir minnilutin (Adolf Hansen) fram fylgjandi uppskot:

I

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um eykajáttan til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

lagtingslov om ekstraordinær bevilling til mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* Til § 16-2490-3301 í figgjurløgtingslógini verða játtaðar kr. 30.000.000,00 afturat tí áður játtaða.

§ *1.* Til § 16-2490-3301 på finanslagtingsloven bevilges kr. 30.000.000,00 yderligere.

§ *2.* Henda lóg fær gindi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

II

UPPSKOT
TIL
SAMTYKTAR

Løgtingið samtykkir, at allir fiskaprísir, ið Ráfiskagrunnurin ásetur, verða hækkaðir við 25 oyru/kg, tó til svartkjaft til mama 5 oyru/kg.

Hesir prísir verða framyvir at rokna sum grundprísir.

III

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um prístalsregulering av fiskaprísum.

§ *1.* Allir fiskaprísir ið ásettir verða av Ráfiskagrunninum verða dýrtíðarviðgjørdir við prísum pr. 30. september 1981 sum grundprísir við 4 oyru/kg fyri hvørt stig, prístalið fer upp eftir nevnda dag, svartkjaftur tó 1 oyra/kg fyri hvørt stig, prístalið fer upp.
2. stk. Fellur prístalið undir tað, tað er pr. 30. september 1981, verður eingin dýrtíðarviðgerð.

§ *2.* Henda lóg skal ikki ávirka vanligar prísbroytingar, sum Ráfiskagrunnurin ásetur.

§ *3.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om pristalsregulering af fiskepriser.

§ *1.* Alle fiskepriser der fastsættes af Råfiskefonden bliver dyrtidsreguleret efter pristallet med priserne pr. 30. september 1981 som grundpriser med 4 øre/kg for hvert point, pristallet stiger efter nævnte dato, blåhvilling dog 1 øre/kg for hvert point, pristallet stiger.
Stk. 2. Falder pristallet under det, der er gældende den 30. september 1981, foretages ingen dyrtidsregulering.

§ *2.* Denne lov skal ingen indflydelse have på de prisændringer, der foretages af Råfiskefonden.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

IV

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðslønum.

§ *1.* Í § 1 í løgtingslóg nr. 36 frá 21. mai 1975 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn verða gjørdar hesar broytingar:
»60 oyrum« verður broytt til »30 oyrum«, »hvørji full 3 stig« verður broytt til »hvørt stig«.

§ *2.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om pristalsbehandling af arbejderlønninger.

§ *1.* I § 1 i lagtingslov nr. 36 af 21. mai 1975 om pristalsbehandling af arbejderlønninger foretages følgende ændringer:
»60 øre« ændres til »30 øre«, »hver fulde 3 points« til »hvert point«.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

V

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:
Í § 3 verða »105 kr.« broytt til »52,50 kr.« og »hvørji 3 stig« broytt til »hvørt stig«.
Í § 4, 2. stk. verða »3,75 kr.« broytt til »2,40 kr.« og »hvørji 3 stig« broytt til »hvørt stig«.

§ *2.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:
I § 3 ændres »105 kr.« til »52,50 kr.« og »hvert 3 points« ændres til »hvert point«.
I § 4, 2. stk. ændres »3,75 kr.« til »2,40 kr.« og »hver 3 points« ændres til »hvert point«.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:
Álit 1: Minnilutauppskot frá Adolf Hansen, I fall við 14-0, II § 1 falt við 1-0, 2. stk. fall við 1-0, III fall við 12-0, IV fall við 7-0. Meirilutauppskot, pkt. 1 samtykt við 18-0, stk. 2 samtykt við 17-0 pkt. II samtykt við 18-0. Uppskot landsstýrisins I, § 1, 1. stk., 1. pkt. samtykt við 17-6, pkt. 3-7 samtykt við 18-3, pkt. 7 samtykt við 18-2, pkt. 11 samtykt við 17-3, pkt. 17 samtykt við 25-0, pkt. 25 og 27 samtykt við 18-4, 27.01 til 27.06 samtykt við 18-0. Sum nýtt 2. stk. samtykt við 18-0, stk. 6 í § 2 sum pkt. g samtykt við 30-0, stk. 6 í § 8 samtykt við 20-0, stk. 6 í § 10 samtykt við 18-2, § 2 samtykt við 17-0. Minnilutauppskot frá Adolf Hansen í álitti III fall við 14-0.

Landsstýrisuppskotið I § 3 samtykt við 17-0. Lógin soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð við 18-3.

Broytingaruppskot til landsstýrisuppskoti frá meiriluta í nevndini I 1) samtykt við 18-0, 2) 17-0, II 3) 18-0.

Landsstýrisuppskotið II løgtingslóg um broytingar í reglunum um serligt innflutningsgjald § 1, 1. stk. samtykt við 17-2, restin av § 2 samtykt við 22-0,§§ 2 og 3 samtykt við 17-0. Broytingaruppskot frá Tjóðveldisflokkinum fall við 14-0.

§ 3 samtykt við 17-0, at fara til 3. viðgerð varð samtykt við 18-4.

Landsstýrisuppskotið III løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eyka innflutningsgjald, § 1 samtykt við 31-0, § 2 við 18-0. Broytingaruppskot frá Ova Mikkelsen varð afturtikið, § 3 samtykt við 31-0. Samtykt at fara til 3. viðgerð við 28-0.

IV Broyting frá minniluta í nevndini (Adolf Hansen) fall við 9-0. Uppskot frá sama minniluta fall við 13-0. Landsstýrisuppskotið IV løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, § 1 samtykt við 31-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu, lógin soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 30-0.

Álit 1 uppskot frá minniluta (J. Thomsen) § 1 fall við 13-0, lógaruppskotið sostatt burturfallið.

III uppskot til samtyktar frá minniluta í nevndini (Adolf Hansen) fall við 13-0. III uppskot frá minniluta í nevndini (A.H.) fall við 14-0. Lógaruppskotið sostatt burturfallið.

IV uppskot frá minniluta í nevndini (A.H.) § 1 fall við 14-0. Lógaruppskotið sostatt burturfallið.

I uppskot til samtyktar frá Ova Mikkelsen fall við 14-0.

II uppskot til samtyktar frá Ova Mikkelsen fall við 14-0.

Frávik í tíðarfreistini til at hava 3. viðgerð varð givin og fór hon fram á seinni fundi sama dag.

Atkvøðugreiðslan varð soleiðis:

I Løgtingslóg um broytingar í innflutningsgjøldum. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-2.

II Løgtingslóg um broytingar í reglunum um serligt innflutningsgjald, lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-4.

III Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald, lógin soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0.

IV Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnunu, lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-0.

F.L.j.nr. 430-12-36. Lógirnar nr. 49, 50, 51 og 52 frá 9. sept. 1981.

15. Studningur til veiðu eftir svartkjafti

Ár 1981, friggjadagin 4. september legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um studning til veiðu av svartkjafti.

lagtingslov om tilskud til fangst af blåhvilling.

§ *1.* Til landingar av svartkjafti frá føroyskum fiskifari í Føroyum verður latið í studningi 20 oyru/kg av teimum fyrstu 10.000 tonsunum, ið landað eru, eftir at henda lóg er komin í gildi.

§ *1.* Til landing af blåhvilling fra færøske fiskefartøjer på Færøerne ydes i tilskud 20 øre/kg af de første 10.000 tons, der er landet efter, at denne lov er sat i kraft.

§ *2.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vit hava nú fiskað svartkjaft í nøkur ár. Í fleiri ár er veiðan lítið broytt. Á føroyskum øki verða tó veiddar so stórar nøgdir av svartkjafti, at vit eiga at gera meira við at fiska hesar nøgdir sjálvir.

Vit koma helst í framtíðini at fáa specialskip, sum koma at veiða henda fisk og viðgera hann umborð, men vit eiga eisini at halda fram við royndunum at føra hann til lands og síðani viðgera hann.

Fyri at stuðla hesum hevur ráfiskanevndin sett prís á svartkjaft til matna.

Av tí at vit ikki enn hava lært okkum at fiska svartkjaft nóg væl uttanfyri tíðina frá mars til juni, eru menn varnir við at fara undir hesa veiðu.

Skotið verður tí upp at játta 20 oyru/kg av teimum fyrstu 10.000 tonsunum, sum verða veidd og landað í Føroyum, aftaná at henda lógin er komin í gildi, í studningi til svartkjaft til ídnað, landaður í Føroyum, partvíst fyri at stuðla monnum í at fara meir undir hesa vinnu, og partvís fyri at hjálpa nótaskipunum, sum jú hava havt vánaligar vinnumøguleikar í ár.

Skotið verður upp at geva landsstýrinum heimild til at nýta pening til hetta av stuðlinum til fiskivinnuna.

Formaðurin bað um frávik at viðgera tingmálini 13, 14 og 15. Hetta varð samtykt við navnakalli.

Ja atkvøddu Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eiliv Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Sverre Midjord, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 9. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 7. september beint í figgjarnevndina.

Málið er viðgjørt á fundi í figgjarnevndini tann 9. september 1981 kl. 10.

Nevndin er samd um at mæla til, at lógin fær gildi til og við 1. mars 1982.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið er á síðu 2 tilskilað, at talan er um studning til svartkjaft til ídnað, men er figgjarnevndin av ti áskoðan, at heimildin skal fevna allan veiddan svartkjaft, eisini tann til matna o.a.

Figgjarnevndin setir sostatt fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ 2 verður soljóðandi:	§ 2 bliver sålydende:
»Henda lög fær gildi beinanvegin og fer úr gildi 1. mars 1982.«	»Denne lov træder i kraft straks og træder ud af kraft den 1. marts 1982.«

14. september legði figgjarnevndin samd fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1 verður sett sum síðsta punktum:	Som sidste punktum til § 1 tilføjes:
»Studningurin verður at býta millum manning og fiskifar, sum søla av veiðu verður býtt.«	»Tilskuddet fordeles mellem mandskab og fiskerfartøj på samme måde, som salg af fangst fordeles.«

2. viðgerð sama dag. Broyting frá nevndini samtykt við 30-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 30-0, § 2 við 31-0, at fara til 3. viðgerð við 31-0.

3. viðgerð 15. september. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1539-4. Lóg nr. 66 frá 2. okt. 1982.

---

16. Broyting í studninginum til skipasmiðjur til bygging av skipum

Ár 1981, fríggjadagin 4. september legði Pauli Ellefsen, løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 1. Í § 5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum verður »9,75%« broytt til »17,25%«.

§ 2. Henda lóg fær gildi fyri byggisáttmálar gjørdir aftaná, at lógin er komin í gildi, og fyri eldri sáttmálar fyri tann partin av tilfarinum til skipabyggingina, ið verður innloystur, aftaná at lógin er komin í gildi.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om fornyelse af fiskerflåden.

§ 1. I § 5, stk. 2 i lagtingslov nr. 24 af 1. juni 1978 om fornyelse af fiskerflåden ændres »9,75%« til »17,25%«.

§ 2. Denne lov hur gyldighed for de byggekontrakter, der indgås efter, at loven er trådt i kraft og for ældre kontrakter for den del af materialet til skibsbygningen, der indløses efter, at loven er trådt i kraft.

11 *løgtinglóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til bygging av farmaskipum.*

§ *1.* Í § 6 í løgtingslóg nr. 15 frá 31. mars 1966 um stuðul til bygging av farmaskipum verður »9,75%« broytt til »17,25%«.

§ *2.* Henda lóg fær gildi fyri byggisáttmálar gjørdir aftaná, at lógin er komin í gildi og fyri eldri sáttmálar fyri tann partin av tilfarinum til skipabyggingina, ið verður innloystur aftaná, at lógin er komin í gildi.

11 *Lagtingslov om ændring i lagtingslov om støtte til bygning af fragtskibe.*

§ *1.* I § 6 i lagtingslov nr. 15 af 31. marts 1966 om støtte til bygning af fragtskibe ændres »9,75%« til »17,25%«.

§ *2.* Denne lov har gyldighed for de byggekontrakter, der indgås efter, at loven er trådt i kraft og for ældre kontrakter for den del af materialet til skibsbygningen, der indløses efter, at loven er trådt i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir teimum í lógaruppskotinum nevndu lógum kunnu skipasmiðjur til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfari til bygging av deksfiskifari ella farmaskipi í Føroyum fáa í studningi upp til 9,75% av virði skipsins eftir meting.

Tey 9,75% vórðu ásett í 1969, hækkaði frá 6%, sama árið sum serliga innflutningsgjaldið varð hækkað frá 8% til 13%. Í 1979 kom eykainnflutningsgjald við 2%, sama árið hækkað til 4% og í 1980 hækkað til 7%. Tilfar til nýbygningar er undir hesum báðum gjøldum, samanløgd 20%.

Í løgtingsmáli nr. 14/1981: Ymisk inntøkulógaruppskot hevur landsstýrið skotið upp at hækka serliga innflutningsgjaldið til 20% og at lækka eykainnflutningsgjaldið til 5%.

Síðani 1969 eru skipasmiðjurnar soleiðis komnar undir eina samlaða hækking í innflutningsgjøldum frá 13% til 25%, um inntøkulógaruppskotið verður samtykt, uttan at studningurin til nýbygningar er reguleraður.

Skipasmiðjurnar í Tórshavn og á Skála hava heitt á landsstýrið um at fáa procentstudningin hækkaðan og verður nevnd ein hækking uppá 0,75% fyri hvørt stigið omanfyri 13%, innflutningsgjøldini eru hækkað, t.v.s. 9%, um gjøldini samanløgd verða 25%.

Landsstýrið metir ikki tað verða neyðugt, at hækkingin er 9%, men skjýtur upp 7,5%.

Lagt verður afturat, at skipasmiðjurnar í farmagjaldsstudningi umframt fáa 4,5% av skipavirðinum eftir meting.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 14. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 7. september beint í figgjarnevndina.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) er av teirri áskoðan, at 9,75% studningur ikki eigur at hækkast við 7,5%, men við 6,25%. Endurrindingin verður sostatt 16%.

Saman við óbroytta farmagjaldsstudninginum uppá 4,5% verður studningsprosentið 20,5, ið sum áður verður roknað av metingini fyri skipið.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur undir við viðmerkingum figgjarnevndarinnar í málinum, men ikki við uppskoti landsstýrisins.

Nevndi meiriluti setur sostatt fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

I Í § 1 verður »17,25%« broytt til »16%«.	I § 1 ændres »17,25%« til »16%«.
II Í § 1 verður »17,25%« broytt til »16%«.	I § 1 ændres »17,25%« til »16%«.

2. viðgerð 14. september. Broytingaruppskot II frá nevndini til § 1 samtykt við 28-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 28-0, § 2 samtykt við 28-0, at fara til 3. viðgerð samtykt við 28-0.

II Broyting frá nevndini til pkt. I samtykt við 28-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 28-0, § 2 samtykt við 28-0, at fara til 3. viðgerð samtykt við 28-0.

3. viðgerð 15. september. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1415-2. Lóg nr. 67 og 68 frá 2. okt. 1981.

17. Flutningsstudningur til útróðrarfisk

Ár 1981, friggjadagin 4. september legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* Í § 5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður sett sum nýtt 2. punktum: »Studningurin verður latin til fiskavirkið, tá ið hetta hevur borið kostnaðin av flutninginum.«

§ *1.* I § 5, stk. 2 i lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet tilføjes som nyt 2. punktum: »Tilskudet ydes til fiskerianlægget, såfremt dette har bekostet transporten.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi lóg fáa dekksfiskifør við línu ella snellu í feskfiskaveiðu og opnir útróðrarbátar 15 oyru/kg í studningi, tá veiðan verður avreidd á plássum, har møguleiki ikki er at virka veiðuna ella part av henni, og tann óvirkaði parturin beinanvegin verður fluttur til næsta fiskavirki. Studningurin verður latin til bátin.

Áheitan er komin til landsstýrið, har greitt verður frá, at tað ofta liggur illa fyri hjá útróðrarmonnunum aftaná langan arbeiðsdag tá at fara undir at leita eftir flutningsmøguleikum. Fært verður fram, at fiskavirkini í flestu førum hava flutningsbilar og tí meira ómaksleyst kunnu syrgja fyri flutninginum.

Landsstýrið tekur undir í áheitanini og mælir tí til, at studningurin verður goldin til fiskavirkið í teimum førum, har fiskavirkið hevur borið kostnaðin av flutninginum.

1. viðgerð 7. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 14. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 7. september beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9. september 1981 kl. 10.

Galdandi regla í § 5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna sigur, at í teimum undir § 5, 1. stk. punkt e og g nevndu førum, tað er e) á deksfiskifari við línu ella snellu í fiskifiskaveiðu og g) á opnum útróðrarbáti, har veiðan verður avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella partar av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanvegin verður fluttur til næsta fiskavirki, verður latið 15 oyru/kg cyka fyri henda partin av veiðuni.

Landsstýrið hevur skotið upp, at studningurin eisini kann veitast fiskavirkjum, tá hetta ber kostnaðin av flutninginum.

Ein samd figgjarnevnd mælir til, at studningurin verður latin honum, ið ber kostnaðin av flutninginum.

Viðvíkjandi reguni sum heild mælir figgjarnevndin til, at orðingin verður broytt soleiðis, at tilskilað verður, at hetta er galdandi í teimum førum, har veiðan verður avreidd ella uppskipað, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella bert partar av henni og afturat, at orðið »næsta« verður strikað, tá kostnaðurin er tann sami likamikið hvar virkið liggur. Um hvør fær studningin verður tilskilað, at hetta kann verða virkið, útróðrarfelagið, fiskimaðurin sjálvur ella hann, ið átekur sær flutningin.

Sostatt setir ein samd figgjarnevnd fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður § 5, 2. stk. orðað soleiðis:

»Í teimum undir 1. stk., punkt c og g nevndu førum, har veiðan verður avreidd ella uppskipað á plássum, har

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet formuleres § 5, 2. stk. som følger:

» I de under stk. 1, punkt c og g nævnte tilfælde, hvor fangst indhandles eller ilandbringes på steder,

møgulcikar ikki eru at virka veiðuna ella bert partar av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanvegin verður fluttur til fiskavirki, verður latið 15 oyru/kg eyka fyri hcnda partin av veiðuni. Studningurin verður latin honum, ið ber kostnaðin av flutninginum.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

hvor der ikke er muligheder at tilvirke fangsten eller blot dele af denne, og den del, der ikke kan tilvirkes, straks transporteres til fiskerianlæg, ydes der 15 øre/kg ekstra. Tilskudet ydes til den, der har bekostet transporten.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 14. september. Málið varð aftur beint í figgjarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 7. september beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9. september 1981 kl. 10.

Galdandi regla í § 5, 2. stk. í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna sigur, at í teimum undir § 5, 1. stk. punkt e og g nevndu førum, tað er e) á deksfiskifari við linu ella snellu í leskfiskaveiðu og g) á opnum útróðrarbáti, har veiðan verður avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella part av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanvegin verður fluttur til næsta fiskavirki, verður latið 15 oyru/kg eyka fyri hcnda partin av veiðuni.

Landsstýrið hevur skotið upp, at studningurin eisini kann veitast fiskavirkjum, tá hetta ber kostnaðin av flutninginum.

Ein samd figgjarnevnd mælir til, at studningurin verður latin honum, ið ber kostnaðin av flutninginum.

Viðvíkjandi regluni sum heild mælir figgjarnevndin til, at orðingin verður broytt soleiðis, at tilskilað verður, at hetta er galdandi í teimum førum, har veiðan verður avreidd ella uppskipað, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna ella bert partar av henni og afturat, at orðið »næsta« verður strikað, tá kostnaðurin er tann sami likamikið hvar virkið liggur. Um hvør fær studningin verður tilskilað, at hetta kann verða virkið, útróðrarfelagið, fiskimaðurin sjálvur ella hann, ið átekur sær flutningin.

Sostatt setir ein samd figgjarnevnd fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður § 5, 2. stk. orðað soleiðis:
»Í teimum undir 1. stk., punkt e og g nevndu førum, har veiðan verður avreidd ella uppskipað á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna ella bert partar av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanvegin verður fluttur til fiskavirki, verður latið 15 oyru/kg eyka fyri henda partin av veiðuni. Studningurin verður latin honum, ið ber kostnaðin av flutninginum. Landsstýrið saman við fíggjarnevndini ásetur reglugerð viðvíkjandi umsiting av flutningsstudningsskipanini.«

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet formuleres § 5, 2. stk. som følger:
»I de under stk. 1, punkt e og g nævnte tilfælde, hvor fangst indhandles eller ilandbringes på steder, hvor der ikke er muligheder at tilvirke fangsten eller blot dele af denne, og den del, der ikke kan tilvirkes, straks transporteres til fiskerianlæg, ydes der 15 øre/kg ekstra. Tilskudet ydes til den, der har bekostet transporten. Landsstyret sammen med finansudvalget fastsætter reglement for administration af transporttilskudsordningen.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Framhaldandi 2. viðgerð sama dag. Uppskotið frá nevndini § 1 samtykt við 32-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu, soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 32-0 atkvøðum.

4. viðgerð 15. september. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1539-4. Lóg nr. 65, 2. okt. 1981.

18. Skopunar havn.

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um
Útbygging av Skopunar havn

§ *1.* Til dýping av Álinum og sum uppískoytisjáttan til tey arbeiði sum eru í gerð, verður úr landskassanum veittur Skopunar kommunu studningur stórur 75% av byggipeninginum tó í mesta lagi 75% av 1.6 mió. kr. at rinda í eins stórum ársgjøldum í 2 fylgjandi fíggjarár, fyrstu ferð í fíggjarárinum 1981/82.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om
Udbygning af Skopunar havn

§ *1.* Til uddybning af havnebassinet Álurin og som ekstrabevilling til de arbejder der er under udførelse ydes der af landskassen til Skopunar kommune tilskud svarende til 75% af anlægsudgifterne, dog højst 75% af 1.6 mio. kr., som udbetales i lige store årsrater i 2 på hinanden følgende finansår, første gang i finansåret 1981/82.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar

Nú ytra og miðhavnin í Skopun verða dýpdar, ynskir bygdaráðið, at Álurin, sum er tann minsti havnarhylurin har, eisini verður dýpdur.

Sum er, er dýpið í Álinum 3,5 m; hetta er ov lítið dýpi, um øll før, ið hoyra heima í Skopun, skulu kunna koma inn har; roknað má nevniliga verða við, at okkurt kann verða áfatt við portrinum í ytru havnini, so neyðugt verður framvegis at hava Álin at taka til, tá ikki er liggjandi í hinum havnarhyljunum.

Havnin í Skopun er lítil, so tíðan verður ivaleyst brúk fyri Álinum at leggja skip í, eisini í góðum líkindum. Ynskjandi er tí, at hyljarnir hava sama dýpi allir.

Eisini er at siga, at skal Álurin dýpast, eigur tað at verða nú, meðan havnin er turrløgd.

1. viðgerð 14. september. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 15. september. Adolf Hansen setti uppskot um at beina málið í figgjarnevndina. Hilmar Kass bað um atkvøðugreiðslu um frávik frá tingskipanini, hetta varð samtykt við 19-0.

§ 1 samtykt við 31-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð samtykt við 31-0.

3. viðgerð seinni sama dag. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 32-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1811-6. Lóg nr. 64 frá 2. okt. 1981.

---

19. Broytingar í myndingalógini.

Ár 1981, mánadagin 7. september legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at seta í gildi fyri Føroyar:

1. § 1, nr. 2 í lóg nr. 257 frá 4. juni 1969 um broyting av myndingalógini.
2. Lóg nr. 244 frá 8. juni 1978 um broyting í myndingalógini og rættargangslógini.

Viðmerkingar:

Ad. 1. § 1, nr. 1, í hesi lóg viðvíkir býti av foreldramyndugleikanum, um foreldrini eru farin frá hvørjum øðrum. Eisini gevur lógin møguleikar fyri at avgera fyribils, hvør skal hava foreldramyndugleikan, meðan mál um hjúnarskilnað ella separatión eru til viðgerðar.

Eftir § 1, nr. 2, í somu lóg verður innført sum nakað nýtt, at pápin til eitt barn uttan fyri hjúnalag kann fáa rætt til at vera saman við barninum, um hetta verður

mett at vera til frama fyri barnið, og viðurskiftini annars tala fyri hesum, t.d. um foreldrini áður hava livað saman.

Ad 2. Eftir myndingalógini hevur mamman einsamøll foreldrarættin yvir børnum, fødd uttan fyri hjúnarlag. Eftir hesi broytingarlóg kann pápin til eitt barn uttanfyri hjúnalag við dómi fáa foreldramyndugleikan, um tørvurin hjá barninum talar fyri hesum, t.d. um mamman verður mett óegnað til at uppala barnið, og pápin hevur havt neyvt samband við barnið. Undir somu viðurskiftum kann ein pápi til eitt barn uttan fyri hjúnalag fáa foreldramyndugleikan, um mamman doyr, ella um hon ætlar at adoptera barnið burtur.

Omanfyri tilskilaðu dømi, at pápin kann fáa foreldramyndugleikan til børn uttan fyri hjúnalag og rætt at vitja hesi, tí í nógvum førum fyriliggja, at foreldrini hava livað saman uttan at hava verið gift (pappírleyst hjúnalag).

Viðlagt fylgja serprent av lógunum.

[. viðgerð 7. september. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 9. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum 7. september 1981 og við 1. viðgerð sama dag beint í lógarnevndina.

Eftir lógarbroytingunum verða pápar at børnum uttan fyri hjúnalag í høvuðsheitunum stillaðir sum um teir høvdu verið giftir hvat rættinum til at vitja síni børn og fáa foreldramyndugleikan til tey viðvíkur, tá samlívið verður slitið, um viðurskiftini annars verða mett at verða til frama fyri barnið.

Ein meiriluti í nevndini (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Edmund í Garði) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Sami meiriluti átalar, at ríkisumboðið hevur latið málið til andstøðuna at leggja fyri tingið, tá vanliga mannagongdin hevur verið, at ríkislógir verða avgreiddar til tingið um landsstýrið.

Ein minniluti (Jona Hendriksen) vísir á, at hin 31. juli í ár varð lagt fram av Føroya Javnaðarflokki mál nr. 3/1981: Broyting í myndingarlógini og rættargangslógini við hesum viðmerkingum:

Uppskotið snýr seg um foreldramyndugleika v.m. yvir børnum uttanfyri hjúnarlag.

»Tað má haldast at vera órímiligt, at rætturin til børn uttanfyri hjúnarlag — rættur foreldra til børn teirra og til at vera saman við teimum í førum, har børn og foreldur hava livað saman — og foreldrini síðan eru farin hvør frá øðrum — skal ikki vera hin sami, sum tað er úr einum hjúnarlagi.

Eftir galdandi lóg fyri Føroyar hevur bert mamman foreldramyndugleikan til barnið/børnini, tá samlívið hevur verið pappírsleyst.

Pápin hevur heldur ongan lógtryggjaðan rætt til barn sitt ella til at kunna vera saman við sínum barni/børnum í førum, har pappir um samlív treyt — og hetta samliv er uppathildið.

Uppskotið javnsetir ikki »pappirsleyst hjúnarlag« við vanligt hjúnarlag, men tað vil gera tað møguligt hjá pápanum at fáa rætt til at vera saman við barni sínum á sama hátt, sum tað er úr fráskildum hjúnarlagi.

Foreldramyndugleikin yvir børnum uttanfyri hjúnarlag liggur framvegis (sambært uppskotið) hjá mammuni, men uppskotið ger tað møguligt við dómi, at pápin kann fáa foreldramyndugleikan, um tað verður hildið fremjandi fyri barnið, t.d. um mamman verður hildin ikki at vera før fyri at hava barn sítt.

Pápin kann sambært uppskotið haraftrat fáa foreldramyndugleikan, um móðirin ætlar at burturadoptera barnið. Um mamman doyr, áðrenn barnið er komið til myndugleikaaldur, kann pápin somuleiðis fáa foreldramyndugleikan, um hetta er til frama fyri barnið.«

Undir 1. viðgerð bað landsstýrismaður Páll Vang um at fáa málið út í landsstýrið, og hesum eftirlikaðu vit.

Tá nú landsstýrið kemur við máli nr. 19/1981, og hetta eru somu broytingar, mælir minnilutin til, at uppskotið hjá javnaðarflokkinum verður samtykt.

2. viðgerð 9. september. Málið varð aftur beint í lógarnevndina, sum 14. september legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Málið varð undir 2. viðgerð beint aftur í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur ongar broytingar at gera til upprunaliga álitið.

2. viðgerð 14. september. Pkt. 1 samtykt við 31-0 og pkt. 2 við 29-0.

F.L.j.nr. 529-1

Løgtingstíðindi [98] - 20

20. Løgtingslóg um vinningssteðg.

Ár 1981, týsdagin 8. september legði Olaf Olsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um vinningsstegð.

§ *1.* Vinnurekandi innan idnað, handverk og handil mugu við sølu av vørum innanlands ikki taka hægri bruttovinning hvørki í kr. ella % pr. vørueind enn tann pr. 7. september 1981 ella seinast roknaða bruttovinning fyri somu ella tilsvarandi vøru.

2. stk. Bruttovinningurin eftir stk. 1 er fyri handverk og idnað munurin millum sølupris og beinleiðis útreiðslur til rávørur, hjálpartilfar og beinleiðis arbeiðsløn, og fyri innflytarar, heilsølur og detailhandlar munurin millum sølupris og innkeypspris við almennum gjøldum og vanligum útreiðslum at fáa vøruna heim løgdum aftrat. Er vøran fallin í prísi, má bruttovinningurin í % ikki verða hægri enn frammanundan.

3. stk. Fyri tænastu- og flutningsvirksemi verður stk. 1 - 3 nýtt samsvarandi.

lagtingslov om avancestop.

§ *1.* Erhvervsdrivende inden for industri, håndværk og handel må ved salg her i landet af varer ikke beregne højere bruttoavance hverken absolut eller i % pr. vareenhed end den pr. 7. september 1981 eller senest beregnede bruttoavance for samme eller tilsvarende vare.

Stk. 2. Ved bruttoavancen efter stk. 1 forstås for industri og håndværk forskellen mellem salgspris og direkte udgifter til råvarer, hjælpematerialer samt direkte arbejdsløn og for importører, grossister og detaillister forskellen mellem salgspris og indkøbspris med tillæg af mulige indførselsafgifter og sædvanlige hjemtagelsesudgifter. Er varen faldet i pris, må bruttoavancen i % ikke være højere end før.

Stk. 3. For tjeneste- og transportvirksomhed finder bestemmelserne i stk. 1-3 tilsvarende anvendelse.

§ *2.* Prísráðið hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi lóg verða hildnar.

2. stk. Prísráðið kann í serstøkum førum geva undantaksloyvi frá reglunum í § 1.

§ *2.* Prisrådet fører tilsyn med overholdelsen af bestemmelserne i denne lov.

Stk. 2. Prisrådet kan i særlige tilfælde undtage fra bestemmelserne i § 1.

§ *3.* Vinnurekandi skulu eftir áheitan prógva, hvussu bruttovinningurin

§ *3.* Erhvervsdrivende skal efter anmodning bevise, hvorledes brutto-

verður roknaður. Annars kann prisráðið krevja bruttovinningin lækkaðan til eina upphædd, sum ráðið metir vanliga.

§ 4. Brot á reglurnar í § 1 verður revsað við bót ella hefti.

2. stk. Hann, ið gevur Prisráðnum skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tegir um viðurskifti av týdningi fyri avgerð av einum máli, verður revsaður við bót ella hefti, um ikki hægri revsing er uppiborin eftir revsilógini.

3. stk. Er brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella líknandi, kann bót áleggjast virkinum sum slíkum.

4. stk. Undir viðgerðini av málinum eftir hesi grein verða reglurnar í kapitul 69 í rættargangslógini nýttar í sama mun sum í statsadvokatmálum.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og er galdandi til 31. mars 1982.

avancen bliver beregnet. I modsat fald kan prisrådet kræve bruttoavancen nedsat til et beløb, som efter rådets skøn må antages at være normal.

§ 4. Overtrædelse af bestemmelserne i § 1 straffes med bøde eller hæfte.

Stk. 2. Den, som meddeler Prisrådet urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier forhold af betydning for den pågældende sags afgørelse straffes med bøde eller hæfte, med mindre strengere straf er forskyldt efter straffeloven.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges virksomheden som sådan.

Stk. 4. Ved behandling af sager efter denne paragraf anvendes reglerne i lov om rettens pleje, kapitel 69, i samme omfang som i sager, der påtales af statsadvokaten.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks og er gældende indtil 31. mars 1982.

Viðmerkingar:

Tá ið tey almennu gjøldini av nýtsluvørum hækka, kemur brúkarin sjálvandi at fáa størri útreiðslur.

Fyri at forða fyri, at hesar útreiðslur ikki verða størri enn hægst neyðugt, hevur verið arbeitt við at seta tiltøk í verk hesum viðvikjandi. Her hevur serliga verið hugsað um vinnings- og prissteðg.

Ætlanin var at koma við eini lóg, sum umfataði bæði hesi, men umsitingin av einum prissteðgi kann lætt verða stór og tó ikki nóg góð, so arbeitt verður eina tíð aftrat við hesum partinum fyri at fáa eina haldgóða lóg og reglugerð fyri hesum, so at hetta kemur at virka rættvist.

Vinningssteðgurin er lættari at umsita og umfatar lógaruppskotið bert hendan partin.

Reglurnar skulu skiljast solciðis, at um ein vøra kostar t.d. 100 kr. at keypa, tá ið

lógin kemur í gildi, og vinningurin av henni er 20 kr., so skal vinningurin ikki verða meir enn 20 kr., sjálvt um vøran fer at kosta t.d. 110 kr. at keypa.

Fer vøran niður í t.d. 80 kr. at keypa, so skal hon ikki kosta meir enn 96 kr. at selja, ti vinningurin skal ikki verða meir enn 20%.

1. viðgerð 8. september. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 9. september legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum 8. september 1981 og við 1. viðgerð sama dag beint í lógarnevndina.

Eftir uppskotinum verður vinningssteðgur settur á allar vørur innan handil, handverk og ídnað og fyri tænastu- og flutningsvirksemi.

Prisráðið skal eftir uppskotinum hava eftirlit við, at lógin verður fylgd.

Undir 1. viðgerð av málinum varð m.a. ført fram, at prisráðið ikki hevði manning at umsita lógina, ti bert 1/2 fólk starvaðist hjá ráðnum.

Nevndin hevur fingið upplýst, at á Prisráðnum starvast 3 fólk í heildagsstarvi, nevniliga eitt skrivstovufólk og 2 prisansarar. Haraftrat arbeiðir ein prisansari fyri ráðið í Suðuroy 5 dagar um mánaðin.

Eftir lóg nr. 43 frá 23. juni 1978 um priseftirlit, sum prisráðið arbeiðir eftir, hevur ráðið heimild at áseta vinnings- og prissteðg fyri ávisar vørur upp til 6 mánaðir um ferðina, meðan ein generellur pris- og vinningssteðgur krevur serstaka lógarheimild. Eftir lógini um priseftirlit hevur Prisráðið ásett hámarksprisir og/ella hámarksvinningar á t.d. fylgjandi vørum v.m.: mjólk, bensin, breyð, hýruvognsgjøld, lastbilflutning eins og hækkingar av prisi á byggitilfari og hækking av farmagjøldum hjá privatum føroyskum skipafeløgum skulu góðkennast av Prisráðnum.

Í samband við útrokningar av pristalinum innheintar Prisráðið prísirnar á øllum týðandi vørubólkum hvønn ársfjórðing og hevur tað sostatt tilfar liggjandi, ið eisini kann nýtast í sambandi við eftirlitið við fyriliggjandi lóg.

Í viðmerkingunum upplýsir landsstýrið, at tað ætlaði at koma við eini lóg, ið bæði umfataði vinnings- og prissteðg og at arbeitt verður viðari við málinum um prissteðg. Nevndin heitir á landsstýrið um í góðari tíð at hava reglur klárar, ið skulu avloysa hesa lóg, tá ið hon gongur út 31. mars 1982.

Ein meirilutí í nevndini (Asbjørn Joensen, Agnar Nielsen og Edmund í Garði) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Jona Hendriksen) førir fram, Í løgtingsmáli nr. 14/1981: Løgtingsmál um pris og vinningssteðg mælti Føroya Javnaðarflokkur til at seta pris- og vinningssteðg í gildi frá 8. september í ár til 31. mars 1982, men meirilutin á tingi fordaði fyri, at málið kundi fáa viðgerð í lógarnevndini, hóast tað náttúrligt átti at verið viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 20/1981: Løgtingsmál um vinningssteðg.

Úrfrá tí at minnilutin metir, at uppskot javnaðarfloksins gekk víðari og í størri mun hevði virkað eftir ætlan enn uppskot landsstýrisins, loyvir minnilutin sær at seta fram niðanfyri standandi uppskot í staðin fyri uppskot landsstýrisins:

UPPSKOT
til

løgtingslóg um prís- og vinningssteðg.

§ *1.* Ásettur verður prís- og vinningssteðgir fyri allar vørur í tíðarskeiðinum 10. september 1981 til 1. mars 1982.

§ *2.* Í hesum tíðarskeiði kunnu prishækkanir ikki fara fram við undantak av teimum hækkingum, ið standast av gjøldum til tað almenna, men má vinningur ikki roknast av hesum.

§ *3.* Tó kann Prísráð Føroya eftir umsókn geva loyvi til prishækkingar, tá fullgott prógv er fyri at so má vera.

§ *4.* Í reglugerð, sum skal góðkennast av fíggjarnevnd Føroya Løgtings, ásetir Føroya Landsstýri nærri reglur fyri, hvussu hendan lóg verður at umsita.

§ *5.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om pris- og avancestop.

§ *1.* Pris- og avancestop træder i kraft for alle varer i perioden 10. september 1981 indtil 1. marts 1982.

§ *2.* I dette tidsrum kan der ikke foretages prisforhøjelser med undtagelse af de forhøjelser, der er forårsaget af afgifter til det offentlige, men fortjeneste må ikke beregnes af disse.

§ *3.* Dog kan Færøernes Prisråd efter ansøgning give tilladelse til prisforhøjelser, såfremt tilfredsstillende bevis føres, for at dette er nødvendigt.

§ *4.* I reglement, der skal godkendes af Lagtingets finansudvalg, fastsætter Færøernes landsstyre nærmere regler for, hvordan denne lov skal administreres.

§ *5.* Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 9. september. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 19-0, §§ 2, 3 og 4 við 18-0, § 5 samtykt við 19-0. Við atkvøðugreiðslu um uppskotið frá minnilutanum í nevndini (Jona Hendriksen) fall § 1 við 10-0.

3. viðgerð á seinri fundi sama dag. Frávik vurdu givið. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1115-24 Lóg nr. 54 frá 14. sept. 1981.

21. Stuttleikagjøld

Ár 1981, týsdagin 8. september legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um stuttleikagjøld.

§ *1.* Løgtingslóg nr. 49 frá 19. juli 1966 um stuttleikagjøld sum hroyir við løgtingslóg nr. 24 frá 9. mai 1972 fer úr gildi 31. december 1981.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om forlystelsesafgifter.

§ *1.* Lagtingslov nr. 49 af 19. juli 1966 som ændret ved lagtingslov nr. 24 af 9. mai 1972 om forlystelsesafgifter træder ud af kraft den 31. december 1981.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Stuttleikagjøld av dansi og kvikmyndasýningum her á landi eru fyrstu ferð ásett við fyribilskunngerð frá 28. november 1940 við seinni broytingum.

Við løgtingslóg nr. 49 frá 19. juli 1966 um stuttleikagjøld er avgjaldið sett til 33 1/3% av hvørjum atgongumerki til almennan dans (føroyskur dansur undantikin) og av hvørjum atgongumerki til almennar kvikmyndasýningar.

Uppskot um avtøku av stuttleikagjøldunum kom á tingbord 12. januar 1971, smb. tingmál nr. 15/1970, men fall. Árið eftir vórðu gjøldini sett niður í 25% smb. løgtingslóg nr. 24 frá 9. mai 1972.

Í stuttleikagjøldum eru seinastu 6 árini inntkomnar hesar upphæddir:

	DANSUR KR.	KVIKMYNDIR KR.
1976/77	200.322,26	647.497,92
1977/78	298.101,38	686.886,10
1978/79	343.649,15	958.014,67
1979/80	352.908,33	951.837,55
1980/81	239.220,85	727.936,30
1981/82 pr. 30/7-81	47.000,00	53.000,00

Tað er ikki tilskilað í lógini um stuttleikagjøld, hvat peningurin skal nýtast til. Men sum viðmerking til fíggjarløgtingslógina stendur, at alt stuttleikagjaldið verður lagt í grunn til mentunarmál.

Grunnurin hevur mett seg ár undan ári.

	KR.
Pr. 31/3 1975	654.855,67
" 31/3 1976	946.476,99
" 31/3 1977	1.643.042,89
" 31/3 1978	2.528.030,37
" 31/3 1979	3.016.878,81
" 31/3 1980	3.835.310,05
" 31/3 1981	4.346.515,78

Síðani lógin um ungdómshús kom í gildi, er ein vaksandi partur av studningunum til byggjan av hesum húsum veittur úr grunninum.

Í dag er allur studningurin til byggjan av ungdómshúsum tikin úr grunninum til mentunarendamál.

Bæði stuttleikagjøld av dansi og kvikmyndum hava sostatt verið minkandi seinastu 2-3 árini. Seinasta fíggjarár var samlaða stuttleikagjaldið umleið 1 milj. kr., og í hesum ári verður tað væntuliga munandi minni.

Orsøkin til, at minni kemur inn av dansi, stavar frá diskotekklubbunum, sum tóku seg upp fyrst í 70-unum. Diskotekklubbartir sleppa undan stuttleikaavgjaldi, við tað at teir eru bert opnir fyri limum, men tað er missjavn, sum tað eydnast klubbunum at halda hesi reglu uppi. Tí er tað eitt gamalt ynski frá landfútanum, at sleppa dansi undan stuttleikagjaldi, og Tórshavnar kommuna hevur nýliga sent umbøn um tað sama.

Biohallirnar eru undir harðari kapping frá sjónvarpinum, og fleiri loyvishavarar eru illa fyri fíggjarliga.

Havandi í huga, at stuttleikagjøldini fyri mesta partin verða løgd á ungdóm okkara, og at gjøldini í dag ikki standa í rimiligt mát við ta umsiting, sum stendst av hesum gjøldum, verður mælt til at taka stuttleikagjøldini av.

Í Danmark vórðu stuttleikagjøldini avtikin av somu orsøk sum júst nevnt, longu 1. januar 1965 við lóg nr. 132 frá 1. november 1964.

1. viðgerð 9. september. Málið varð við atkvøðugreiðslu beint í fíggjarnevndina, sum 1. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. september 1981 og tvídir 1. viðgerð 9. september beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskoti landsstýrisins skal løgtingslóg nr. 49 frá 19. juli 1966 um stuttleikagjøld við seinni broyting fara úr gildi 31. december 1981.

Undir viðgerðini í figgjarnevndini hava fundir verið við Føroya gjaldstovu, landfútan og umboð fyri biohallirnar í Tórshavn.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen og Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam) tekur støðu í tingsalinum.

Minnitutin (Adolf V. Hansen) viðmerkir, at undir nevndarviðgerðini vóru frágreiðingar og metingar givnar figgjarnevndini av Føroya gjaldstovu, Landfútanum og biohallareigarum í Tórshavn.

Niðurstøðan hesin kom til er í stuttum henda:

FØROYA GJALDSTOVA: Stuttleikagjøldini fara óskerd í ein grunn, hvørs endamál er at stuðla bygging av húsum til ungdómin av stytta sær um stundir í t.e. bygdahús o.a.

Verða gjøldini avtikin, missir grunnurin eina inntøku, sum uttanfarnu ár hevur ligið um slaka millión, og tilsvarandi minni verður at byggja hús fyri til ungdómin.

FØROYA LANDFÚTI: Politiið vil fegin hava tey ungu undir tak, men undir skipaðum viðurskiftum.

Frá 1969/70 komu klubbar inn í myndina fyri at sleppa undan skyldum viðvikjandi afturlatingartíðum og stuttleikagjøldum. Men klubbarnir fáa nú bert loyvi at hava dans eftir avtalu við politiið, og skulu gjalda stuttleikaskatt. Hetta er ein avgerð, landfútin hevur sett í gildi fyri alt landið. Tó eru ølklubbarnir ikki *enn* komnir undir hesa skipan.

Henda skipan hevur broytt ungdómsaktivitetin munandi á betra borðið.

BIOHALLAREIGARARNIR: At avtaka stuttleikaskattin broytir ikki talið á teimum sum ganga í biograf, men førir við sær, at lutfallsliga størri partur av umsetninginum fer til útleigarar og av landinum.

Betra loysnin var at varðveita stuttleikagjøldini, og geva biohallunum ein styrk til raksturin, ta tíð eitt nýbyrjað sjónvarp minkar um umsetningin.

Biohallirnar koyra í løtuni við halli og eru, í royndunum at fáa raksturin at bera seg, noyddar beri at sýna dýrar kvikmyndir á høgum góðskustigi.

Lata biohallirnar aftur, fer ungdómurin út á gøturnar, um ikki annað verður fyriskipað, t.d. ungdóms- og bygdahús vera til taks.

Út frá hesum metingum, gjørdar av sakkønum, kann minnilutin ikki taka undir við at avtaka stuttleikagjøldini, við tað at tey koma gjaldarunum (ungdóminum) til góðar.

Við at varðveita stuttleikagjøldini og við at gera tey galdandi, eisini fyri klubbar

við regluligum stuttleikaraldarstyttingum, fyri meira enn ávisum tali av fólki, gerst ungdómurin sjálvbjargin eisini á hesum øki.

Út frá hesum setir minnilutin (Adolf V. Hansen) fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at endurskoða løgtingslóg nr. 49 frá 19. juli 1966 við seinri broytingum um stuttleikaskatt sambært tí, ið omanfyri er framført.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Annfinn Klakksberg, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen og Ove Mikkelsen) er av teirri áskoðan, at spurningurin um filmseftirlit í sini heild, eigur at verða viðgjørdur og setir fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at endurskoða lógina um filmseftirlit.

2. viðgerð 11. december. Málið varð aftur beint í figgjarnevndina, sum 12. februar legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Eftir at álit varð lagt fram av figgjarnevndini tann 1. december 1981 varð málið eftir 2. viðgerð tann 11. december 1981 beint aftur í figgjarnevndina eftir uppskoti frá Karin Kjølbro.

Figgjarnevndin hevur á fundi tann 2. februar 1982 aftur viðgjørt málið.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins og viðmerkir, at ásannandi at 4 milj. kr. standa í grunninum, ið svarar til bygging fyri umleið 12 milj. kr., kann málið verða tikið upp til nýggja viðgerð, tá nevndu 4 milj. kr. eru brúktar. Verandi inntøka av stuttleikagjøldunum er fallandi og kann bert rinda umsiting.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) vísir til álit sítt frá 30. november 1981, framlagt 1. december 1981.

12. februar varð loyvi givið til frávik í tíðarfreistini til framhaldandi 2. viðgerð við atkvøðugreiðslu við 19-0 atkvøðum.

Framhaldandi 2. viðgerð 16. februar. § 1 í lógaruppskotinum samtykt við 28-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd samtykt við 31-0. Uppskotið til samtyktar frá Adolf Hansen fall við 4-0.

23. februar varð framlagt

ÁLIT
III

Fíggjarnevndin legði fram álit II í løgtingsmálinum tann 12. februar 1982.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) mælti til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Eftir at málið hevði verið viðgjørt á løgtingsfundi 16. februar 1981, varð málið eftir boðum frá løgtingsformanninum beint aftur í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 19. februar aftur viðgjørt málið, og mælir meirilutin (Ivan Johannesen, Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Niðurstøðan hjá meirilutanum (Ivan Johannesen, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass, (Jørgen Thomsen var ikki á fundi tann 12. november 1981) var, at teir, ið vóru á fundi í fíggjarnevndini 12. november 1981 mæltu til, at avtaka stuttleikagjaldið.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) vísir til álit sitt frá 30. november 1981, framlagt 1. december.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) bað um at fáa sett í álitið viðvikjandi fundarfrágreiðing í fíggjarnevndini tann 12. november 1981 kl. 10.00:

»Kl. 11.30 komu Nepper Christensen, landfúti og Karsten Michelsen, politifulltrúi, á fund og gjørdu viðmerkingar til hetta mál og onnur mál, ið hava tilknýti til hetta.«

Nevndi minniluti vísir til álit sitt frá 30. november 1981, framlagt 1. december 1981.

Sambært uppskotið skal løgtingslóg nr. 9. frá 9. juli 1966 um stuttleikagjøld við

seinri broytingum fara úr gildi 31. december 1981. Tá hetta ikki kann lata seg gera, setir ein samd figgjarnevnd fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT
til

Uppskot landsstýrisins:

Í § 1 verður í staðin fyri »31. december 1981« sett: »31. mars 1982«.	I § 1 indsættes i stedet for »31. december 1981«: »31. marts 1982.«

3. viðgerð 24. februar. Málið varð aftur beint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT
IV

Figgjarnevndin legði fram álit III í málinum tann 23. februar 1982. Løgtingsformaðurin sendi figgjarnevndini málið aftur.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen, Aulfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Víst verður annars til álit III frá 23. februar 1982.

Minniluti (Adolf V. Hansen) bað um at fáa álitið viðvikjandi fundarfrágreiðing í figgjarnevndini tann 12. november 1981 kl. 10.00 soljóðandi:

»2. Løgtingsmál nr. 21/1981: Stuttleikagjøld.

Kl. 10.30 komu Nicodemus Rasmussen og Heri Mohr frá Føroya gjaldstovu á fund og greiddu frá málinum.

Kl. 11.00 komu Jógvan Jacobsen fyri Havnar Bio og Pauli Olsen fyri Leikhús Bio og greiddi frá tí áskoðan, ið biografarnir hava um málið.

Kl. 11.30 komu Nepper Christensen, landfúti og Carsten Michelsen, politifulltrúi á fund og gjørdu viðmerkingar til hetta mál og onnur viðurskifti, ið hava áhuga ella eru í tilknýti til hetta.

Fundurin var niðurlagdur kl. 12.00.«

Nevndi minniluti vísir til álit sitt frá 30. november 1981, framlagt 1. december 1981.

Sambært uppskotið skal løgtingslóg nr. 9 frá 9. juli 1966 um stuttleikagjøld við

seinri broytingum fara úr gildi 31. december 1981. Tá hetta ikki kann lata seg gera, verður til uppskot landsstýrisins sett fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1 verður í staðin fyri »31. december 1981« sett: »30. apríl 1981«.	I § 1 indsættes i stedet for »31. december 1981«: »30. april 1982«.

2. viðgerð 23. apríl. Broyting frá meiriluta í nevndini til § 1 samtykt við 17-0. Landsstýrisins uppskot § 1 samtykt við 20-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. apríl. Málið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.l.j.nr. 406-3 Lóg nr. 55 frá 6. mai 1982.

---

22. Bergholsgerð í Eysturoynni

Ár 1981, týsdagin 8. september løgdu tingmenninir Petur Reinert, Jørgen Thomsen, Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bergholsgerðin úr Leirvík og til Gøtu verður byrjað áðrenn Ólavsøku 1982.

Viðmerkingar:

Tað er øllum monnum greitt, at vegurin til Leirvíkar er sera hættisligur fyri ikki at siga óforsvarligur.

Málið hevur verið reist á tingi fleiri ferðir og í 1978 varð viðtikið at skipa fyri bergholsgerð (sí tingmál nr. 58/1977) — men einki spurdist burturúr, tá spurt varð eftir hesum máli í vetur fekst einki svar.

Tað er bráðneyðugt, at farið verður undir hesa bergholsgerð beinanvegin.

Samstundis verður álagt landsstýrinum at bergholsarbeiðið verður uppafturtikið í Kallsoynni beinanvegin.

1. viðgerð 14. september. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Petur Reinert, Jørgen Thomsen, Finnboga Isaksen og Vilhelm Johannesen tann 8. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 14. september 1981 beint í figgjarnevndina.

Uppskotsstillararnir skjóta upp at álagt verður landsstýrinum at bergholsgerðin úr Lorvík til Gøtu verður byrjað áðrenn ólavsøku 1982.

Figgjarnevndin samtykti at senda málið til ummælis hjá landsverkfrøðinginum, og svarar landsverkfrøðingurin tann 2. apríl 1982, at landsverkfrøðingsstovnurin er farin undir at gera detailprojekt til vegu-tunnilssambandið úr Lorvík og yvir í Gøtudal, soleiðis at frá nevnda stovni er einki til hindurs fyri, at byggiarbeiðið verður byrjað í hesum árinum — um ikki júst innan ólavsøku.

Nevndin býtti seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann og Frederik Olsen) ger vart við, at bergholsgerðin Gøtu-Lorvík er samtykt við lóg, og tá arbeiðið er farið í gongd, er óneyðugt at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Minnilutin (Atli Dam og Ove Mikkelsen) vísir til ummælisskriv frá landsverkfrøðinginum og mælir løgtinginum til, at bergholið verður gjørt.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 20. apríl. Uppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.

23. Renovatiónsmálið í Føroyum

Ár 1981, týsdagin 8. september legði Petur Reinert, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtvkt ar

Løgtingið samtykkir at renovatiónsmálið í Føroyum kemur til umroðu á tingi.

Viðmerkingar:

Undir viðgerðini av løgmansroðuni varð spurningurin um ætlanirnar hjá interkommunala renovatiónsfelagsskapinum um eina centrala ruskbrennistoð reistur.

Spurt varð m.a. um hetta mikla málsøki kanska ikki átti at verið alment.

Vit hava enn einki landsstýrismálsøki, sum eitur umhvørv í øðrum londum hava teir longu í mong ár havt miljøministeriir, og ikki kann tørvurin hjá okkum haldast at vera minni enn hjá teimum. Av tí at her er eitt mál av slíkum slagi, sum tykist um at vera loyst, má tað haldast bráðneyðugt at taka hetta mál til umroðu á tingi fyri at fáa allar upplýsingar fram í dagsins ljós, ikki minst viðmælini frá heilsumyndugleikunum.

Spurt hevur verið eftir hesum viðmælum frá mongum siðum, eisini tá málið um veðhald til hesa brennistoð var fyri á tingi í vetur, men tað tykist ógjørligt at fáa hesar upplýsingar fram.

1. viðgerð 14. september. Málið varð beint í serliga umhvørvisnevnd, sum 23. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 8. september 1981 og undir 1. viðgerð beint í umhvørvisnevndina.

Galdandi reglur í Føroyum í dag viðvikjandi umhvørvisnevnd, dálking og renovatión eru løgtingslóg nr. 48/1970 um náttúrufriðing og tær heilsusamtyktir, ið eru settar í gildi fyri kommununar.

Standardheilsusamtyktin frá 1969 er sett í gildi í hesum kommununum: Klaksvíkar, Fuglafjarðar, Runavíkar, Tórshavnar Uttanbiggja, Vágs, Eiðis Skálavíkar,

Tórshavnar, Nólsoyar, Lorvíkar, Kollafjarðar, Skála og Nes kommunu, í nøkrum førum við smærri broytingum. Henda heilsusamtykt ásetir m.a. reglur viðvíkjandi drekkivatni, kloakeringsviðurskiftum og matframleiðslu.

Verður matvørulóg sett í gildi í Føroyum sambært fyriliggjandi álit um matvørulóggávu, verður partur av heilsusamtyktini frá 1969 óneyðugur.

Í øllum hinum kommununum galda reglurnar í heilsusamtyktini frá 9. september 1933. Í hesi heilsusamtykt eru ásetingar fyri drekkivatn, køstar, nátthús og avlopsrennur. Nevndu ásetingar eru ikki hóskandi til viðurskiftini í dag. Tá hertil kemur, at kloakeringsviðurskiftini nógvastaðni eru óhóskandi, er tørvur á at fáa nýggja heilsusamtykt at galda fyri tær mongu kommunurnar, sum enn ganga eftir heilsusamtyktini frá 1933.

Meðan standardheilsusamtyktin frá 1969 hevur reglur um dálking á landi og í luftini nærhendis bústøðum og náttúrufriðingarlógin hevur ásetingar um dálking á landi, so eru ongar almennar reglur um luftdálking og havdálking, tó undantikið oljudálking. Sostatt er tørvur á eini umhvørvislóggávu, umfatandi náttúruvernd og vernd móti dálking á landi, av luftini og av sjónum.

Verður nevnda matvørulóg sett í gildi fyri Føroyar, og verður nýggj umhvørvislóg gjørd, eigur heilsusamtyktin at verða endurskoðað, sum eitt lið í hesum arbeiði.

Visandi til frammanfyri standandi setir meirilutin (Anfinn Kallsberg, Vilhelm Johannesen, Guttorm Klein og Petur Reinert) fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til umhvørvislóg, sum fevnir um umhvørvið á landi, á sjónum og í luftini, og at endurskoða heilsusamtyktirnar, so tær vera meira í samsvar við galdandi viðurskifti og komandi umhvørvis- og matvørulógir.

Ein minniluti (Ivan Johannesen) setir onki uppskot fram, men tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið frá meiriluta í nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 899-25.

24. Radiosendistøð

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um frávik frá løgtingsins einarætti til útvarpssendingar.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað saman við figgjarnevndini at gera sáttmála við felagið Trans World Radio um útvarpssendingar og um loyvi til bygging og rakstur av útvarpssendistøð her á landi.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om undtagelse fra lagtingets eneret til radiospredning.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget at indgå i en aftale med selskabet Trans World Radio om radiospredning og om tilladelse til opførelse af og drift af en radiospredningsstation her i landet.

§ *2.* Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Síðan Útvarp Føroya varð sett á stovn í 1957, hava vit átt eitt sendiloyvi á millumbylgjubandinum. Loyvt hevur verið at senda í mesta lagi við 5 kW á eini ávísari bylgjulongd, men í 1976 varð hetta broytt, so vit nú hava loyvi at senda við upp til 200 kW.

Millumbylgjusendarin, sum útvarpið nýtir, er 25 ára gamal. Hann er slitin og kann ikki væntast at hava langa livitíð eftir.

Kanningar hava verið gjørdar við tí fyri eyga at byggja eina nýggja støð. Men ein tílík er so kostnaðarmikil bæði í bygging og rakstri, at neyvan er líkt til, at farið verður undir at byggja hana, sum tíðir eru.

Við løgtingsmáli nr. 68 frá 10. mars 1977, nýggjur útvarpssendari, varð lagt uppskot fyri tingið um at byggja nýggjan millumbylgjusendara. Samhært viðlagda kostnaðarætlan, sí tingtíðindi 1976, bind A, bls. 298-303, verður ein 200 kW støð tá mett at kosta 10 mió. kr. at byggja og 450.000 kr. árliga í rakstri. Málið varð útsett til ólavsøku, men sæst ikki at vera komið fyri aftur.

Nevnda sendiloyvi á millumbylgjubandinum hava útlendsk feløg ligið framvið fyri at sleppa at nýta. Eitt av hesum feløgum er Trans World Radio, TWR, sum landsstýrið er sinnað at taka samráðingar upp við. TWR er amerikanskur felagsskapur, ið varpar út kristiligar sendingar um 6 støðir kring heimin. Best kenda

støðin um okkara leiðir er Monte Carlo, har føroyskar sendingar hava verið at hoyrt regluliga í fleiri ár.

TWR er sinnað at byggja eina støð í Føroyum, fyrst eina 50 kW til royndar endamál, seinni eina 200 kW og møguliga eisini eina stuttbylgjusendistøð. Hetta skal felagsskapurin fáa loyvi til uttan avgjald, men afturfyri fáa vit ókeypis senditíð bæði um hesar nevndu sendarar av vanligum tilfari og eisini um hinar støðirnar runt í heiminum av tíðindatilfari.

Um útbyggingarætlan TWR's heldur, kann støðin gerast eitt rættiliga stórt arbeiðsplass, við tað at felagið er sinnað at nýta lokala arbeiðsmegi, so langt hon megnar, t.v.s. maskinmenn, teknikarar, programmeðarbeiðarar v.m.

Felagið TWR hevur fyrr vent sær til landsstýrið fyri at fáa sendiloyvi, nevniliga fyri 8-9 árum síðani, men var tá eingin áhugi fyri málinum. Síðani tá er millumbylgjusendari útvarpsins vorðin tilsvarandi eldri, og vit hava fingið eitt nútímans FM-sendinet, sum røkkur um alt landið. Hetta sendinet verður á ongan hátt órógvað, um vit lata TWR fáa loyvi at senda á millumbylgjubandinum.

10. november segði formaðurin frá, at orsakað skriv frá rikisumboðsmanninum varð málið tikið av skránni.

1. apríl varð málið afturtikið.

F.L.J.nr. 1903-7-4.

---

25. Berghol Lopra - Sumba

Ár 1981, týsdagin 8. september løgdu tingmenninir Hilmar Bech, Sverre Midjord og Ove Mikkelsen fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at bergholsgerðin Lopra — Sumba, ið

sambært løgtingslóg frá 1. november 1978 er samtykt at fremja, verður byrjað í fíggjarárinum 1982/83.

Viðmerkingar:

Í 1978 løgdu Suðuroyartingmenninir Ove Mikkelsen, Hilmar Bech og Sverre Midjord lógaruppskot um bergholsgerð Lopra — Sumba fyri tingið, og varð hetta samtykt.

Sum øllum kunnugt eru møguleikarnir at ferðast til og frá Sumba við bili vánaligir, og til tíðir er tað beinleiðis vandamikið undir verandi umstøðum; ja stundum slepst ikki til og frá bygdini, tí kavi og stormur gera tað ógjørligt at koyra. Vit halda tí, at henda bergholsgerðin, ið er samtykt at gera sambært løgtingslóg frá 1. november 1978, eigur at byrja sum skjótast, og skjóta tí upp, at hetta verður í fíggjarárinum 1982/83.

1. viðgerð 14. september. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 1. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram at løgtingsmonnunum Hilmar Bech, Sverra Midjord og Ova Mikkelsen tann 8. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 14. september beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum til samtyktar skal løgtingið áleggja landsstýrinum at skipa fyri at bergholsgerðin Lopra-Sumba, ið sambært løgtingslóg frá 1. november 1978 er samtykt at fremja, verður byrjað í fíggjarárinum 1982/83.

Minnilutin (Atli P. Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Hilmar Kass) heitir á landsstýrið um at hava fyriliggjandi mál við, tá ætlanin um vegagerð og tunnilsgerð verður gjørd.

Minnilutin (Øssur Dam Jacobsen og Annfinn Kallsberg) setir fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at tillaga bergholsgerðina Lopra-Sumba saman við øðrum bergholum í eina heildarloysn fyri bergholsgerð.

2. viðgerð 15. december. Uppskotið fall við 15-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá minniluta í figgjarnevndini (Øssur Dam Jacobsen og Annfinn Kallsberg) samtykt við 21-0 atkvøðum.

---

26. Uppskot viðvíkjandi rammusáttmálanum við EEC og heimastýrislógini. (lm. 31/1980)

Ár 1981, mikudagin 9. september legði marknaðarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Uppskotið er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum 13. februar 1981 og varð við 1. viðgerð, sum fór fram 23. februar, beint í marknaðarnevndina.

Í uppskotinum til samtyktar verður mælt til at taka fyrivarni viðvíkjandi gildi av rammusáttmálanum við EEC og heimastýrislógini, tí at EEC og donsku rikismyndugleikarnir ikki ætla at uppfylla skyldur sínar sambært hesar sáttmálar, hóast áratangar føroyskar royndir, og álagt verður landsstýrinum saman við marknaðarnevndini at taka upp samráðingar við EEC og donsku rikismyndugleikarnar um hesi mál.

Rammusáttmálin við EEC er bert um fiskiskap, meðan heimastýrislógin umfatar øll samfelagsviðurskifti og verða tey tí viðgjørd hvørt sær.

I Í rammusáttmálanum við EEC stendur millum annað:

»EUROPEISKI BÚSKAPARLIGI FELAGSSKAPURIN (hereftir nevndur felagsskapurin)

øðrumegin, og

DANSKA STJÓRNIN OG FØROYA LANDSSTÝRI

hinumegin

hava Føroya støðu sum ein sjálvstýrandi part av einum av limalondunum í felagsskapinum í huga;

leggja sær samtyktina í Ráðnum tann 4. februar 1974 um Føroya serligu viður skifti í geymu;

hugsa um tann avgerandi týdning, fiskivinnan hevur fyri Føroyar sum landsins týdningarmesti búskaparligi táttur;

hugsa um tað felags ynskið um at varðveita og tryggja skynsama nýtslu av fiskastovnunum í havinum kring strendur teirra;

hava í huga, at ein partur av stovnunum sumstaðni á landleiðunum hjá pørtunum eru fiskasløg, ið eru ógvuliga nærtengd, og sum verða veidd av fiski monnum frá báðum pørtum;

hava í huga, at víðkanin av fiskimørkunum í Atlantshavinum kann elva til eina flyting av veiðiorkuni, sum kann nerva hesar stovnar;

ásanna, at strandalondini á hesum leiðum undir hesum umstøðum hava atlarstørsta áhuga fyri at seta hóskandi tiltøk í verk til tess at varðveita og tryggja skynsama nýtslu av stovnunum;

hava arbeiðið hjá triðju havrættarstevnuni hjá Sameindu Tjóða í huga;

ásanna, at víðkanin hjá strandalondum av teim høvøkjum, har tey hava yvirvaldsrætt yvir fiskastovnunum, og at nýtslan á hesum økjum av yvirvaldsrættinum viðvíkjandi kanning, nýtslu, varðveiting og stýring av hesum stovnum, skulu fara fram sambært og samsvarandi meginreglunum í altjóðarættinum;

taka til eftirtektar, at avgjørt er at víðka fiskiøkið við Føroyar út á 200 fjórðingar frá landi tann 1.1. 1977, at Føroyar innan fyri hetta økið hava yvirvaldsrætt til at kanna, nýta, varðveita og stýra fiskastovnunum innan fyri hetta økið, og at felagsskapurin er samdur um, at markini fyri fiskiøkjunum hjá limalondum hansara (hereftir nevnt fiskiøkið hjá felagsskapinum) skal vera uppril 200 fjórðingar, og at fiskiskapurin innan hetta økið skal fara fram sambært tann felags fiskivinnupolitikkin hjá felagsskapinum;

ynskja at áseta reglur og treytir viðvíkjandi fiskiskapi av felags áhuga:«

og í grein 9 stendur:

»Hesin sáttmáli skal ikki nerva rættindini innan fyri danska kongarikið hjá donskum ríkisborgarum, sum búgva í Føroyum.«

Nevndin heldur, at EEC hevur lagt alt ov lítlan dent á tað, ið her er endurgivið úr rammusáttmálanum.

Ein fyritreyt fyri, at rammusáttmálin skal hava nakað virði er, at á hvørjum ári verða eftir neyðugar samráðingar partanna millum sambært grein 2 ásettar veiðunøgdir hjá hvørjum øðrum, og hvar hesar nøgdir kunnu veiðast.

Hesar samráðingar hava verið aftur í ár, men eitt av londunum, Ongland, noktar at góðtaka samráðingartúrslitið.

Út frá tí, ið her er sagt, hevur EEC ikki hildið rammusáttmálan.

Nevndin (tjóðveldisumboðini tó í aðru syftu) metir, at tað er neyðugt við samráðingum við EEC um rammusáttmálan, og setir fram

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at heita á donsku stjórnina um at skipa fyri, at samráðingar verða millum Føroyar og EEC um innihaldið í rammusáttmálanum.

— · — — — 0 — · · — —

II Nevndin førir fram, at umstøðurnar eru broyttar av tí, at Danmark er farið upp í EEC. Millum annað hevur Danmark latið frá sær avgerðarrættin í nógvum málum, har ímillum uttanríkismálum.

Samgongan hevur boðað frá, at samráðingar skulu fara fram við ríkismyndugleikarnar (um málsøki innan heimastýrislógina) um at gera undirgrund Føroya og havbotnin til føroyskt sermál og eisini verður endurgjaldsskipanin millum ríkið og Føroyar viðgjørt.

Nevndin heitir á ta samráðingarnevnd, sum fer at samráðast við donsku stjórnina, eisini at viðgera tær broyttu fyritreytir orsakaðar av, at Danmark er farið upp í EEC.

Minnilutin (Agnar Nielsen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við at taka fyrivarni viðvíkjandi gildi av heimastýrislógini.
Minnilutin (Agnar Nielsen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein, Svend Aage Ellefsen og Hilmar Kass) ásannar, at broyttu umstøðurnar gera tað náttúrligt at gera broytingar í heimastýrislógini. Millum annað eiga vit at taka fylgjurnar av tí, sum eisini fleiri ferðir hevur verið fört fram, at í veruleikanum eru uttanlands samráðingar og sáttmálar vorðnir føroyskt sermál.

Minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) hevur hetta uppiskoytisálit:

Tá ið hetta mál, ið tjóðveldisflokkurin legði fram 13. februar 1981, loksins fekk viðgerð í tingsalinum, varð tað, eftir tilmæli frá einum einsamallum tingmanni, av løgtingsformanninum, beint aftur til viðgerðar í marknaðarnevndini. Hóast tjóðveldisflokkurin mótmælti, varð hetta gjørt. Hetta hendi á seinasta tingfundi í vár, 4. mai 1981.

Tó at minnilutin fleiri ferðir kravdi málið viðgjørt í nevndini, fekk hetta krav ikki frama fyrr enn málið hevði ligið óviðgjørt 4 mánaðir hjá nevndarformanninum, ella 7. september 1981. Hetta átalar minnilutin.

Á hesum nevndarfundi kom í ljósmála, tað sum minnilutin hevði varhugan av longu tá ið málið í vár varð beint aftur til viðgerðar í nevndini, nevniliga at fólkaflokkurin av óansni var farin longur enn tað tjóður, sum sambandsflokkurin hevði lagt hann í við »fyrivarninum« í samgonguskjalinum: »Mál, sum hevur prinsipiellan týdning fyri samgonguflokk, verður ikki lagt fram og/ella samtykt, uttan at teir triggir samgonguflokkarnir eru samdir um hetta.«

Á tingfundinum í vár var tað eftir kravi frá sambandsflokkinum, at løgtingsformaðurin, formaður fólkafloksins, tók málið av dagsskrá tá og beindi tað aftur í marknaðarnevndina. Úrslitið er so tað, at fólkaflokkurin boygdi seg fyri kravi sambandsfloksins og tí hevur líkið uppskot sítt viðvíkjandi heimastýrislógini aftur. Hetta uppskot ljóðaði so:

»Heitt verður á landsstýrið um tíðir komandi samráðingum við ríkisstýrið at miða móti at gera slíkar broytingar í heimastýrislógini: 1. at uttanríkismál eisini formelt koma á føroyskar hendur, 2. at føroyskur heimarættur verður staðfestur, 3. at føroyingar fáa føroysk pass, 4. at føroyskt mál verður viðurkent sum eitt mál í almennum viðurskiftum í Føroyum«.

Viðvíkjandi heimastýrislógini setir minnilutin í fyrstu syftu fram sama uppskot sum í vár, nevniliga hetta:

UPPSKOT
til
samtyktar

Tíðnar verða upp samráðingar við [illegible] um [illegible] skipanir verða gjørdar í heimastýrislógini.

a) at føroyskur heimarættur sambært tjóðskaparreglum verður staðfestur,
b) at føroyskt mál verður einasta viðurkenda mál í almennum viðurskiftum í Føroyum,
c) at føroyingar fáa føroyskt pass,
d) at øll uttanríkismál koma á føroyskar hendur.

Um so verður at tingið ikki heldur seg til at samtykkja hetta uppskot, setir minnilutin í aðru syftu fram uppskot fólkafloksins frá í vár, nevniliga hetta:

UPPSKOT
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um undir komandi samráðingum við rikisstýrið at miða ímóti at gera slíkar broytingar í heimastýrislógini:
1. at uttanríkismál eisini formelt koma á føroyskar hendur,
2. at føroyskur heimarættur verður staðfestur,
3. at føroyingar fáa føroyskt pass,
4. at føroyskt mál verður viðurkent sum einasta mál í almennum viðurskiftum í Føroyum.

Viðvíkjandi EEC-málinum setir minnilutin í *fyrstu syftu* fram sama uppskot sum í vár, nevniliga hetta:

UPPSKOT
til
samtyktar

Av tí at EEC-myndugleikarnir hava ikki hildið fyrimælini í rammusáttmálanum frá 15. mars 1977, verður teimum boðað frá, at hesin sáttmáli er farin úr gildi.

Um so verður, at tingið ikki heldur seg til at samtykkja hetta uppskot, kann minnilutin eftir umstøðunum í aðru syftu taka undir við uppskotinum frá nevndini í vár hesum viðvíkjandi, sí álit marknaðarnevndarinnar 2. apríl 1981, bls. 3.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) førir fram:

Viðvíkjandi uppskotinum um rammusáttmálan við EEC vísir minnilutin til uppskot til samtyktar frá einari samdari nevnd í vár, og setir fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at beita á donsku stjórnina um at skipa fyri, at samráðingar verða millum Føroyar og EEC um innihaldið í rammusáttmálanum.

Samgongan hevur boðað frá, at samráðingar skulu fara fram við ríkismyndugleikarnar (um málsøki innan heimastýrislógina), um at gera undirgrund Føroya og havbotnin til føroyskt sermál og eisini um endurgjaldsskipanina millum ríkið og Føroyar.

Minnilutin er sannførdur um, at ein loysn má fáast við ríkismyndugleikarnar viðvíkjandi havbotninum og undirgrundini, men minnilutin hevur ikki álit á, at sitandi landsstýri og tess meiriluti fara til samráðingarborðið við ríkismyndugleikarnar um so týdningarmiklar spurningar sum havbotnin, undirgrundina og studningsskipanina, orsakað av ósemju millum samgonguflokkarnar í marknaðarnevndini, júst um hesar spurningar.

Minnilutin heldur tí, at løgtingið í staðin eigur at velja eina løgtingsnevnd, ið fær lítið upp í hendi at føra hesar samráðingar við ríkismyndugleikarnar, og setir tí fram

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið velur 7-mannaløgtingsnevnd til at føra samráðingar við ríkismyndugleikarnar um omanfyrinevndu spurningar.

Minnilutin heitir á la samráðingarnevnd, sum fer at samráðast við ríkismyndugleikarnar, eisini at viðgera tær broyttu fyritreytir, orsakaðar av, at Danmark er farið upp í EEC.

Minnilutin tekur ikki undir við at taka fyrivarni viðvíkjandi gildi av heimastýrislógini.

2. viðgerð 14. sept. Uppskotið frá meirilutanum í marknaðarnevndini varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

Uppskot I til samtyktar frá minnilutanum (Erlendi Patursson og Petur Reinert) fall við 8-0. Uppskot II frá sama minniluta fall við 8 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu, 21 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu: Erlendur Patursson, Juul Jacobsen, Ove Mikkelsen, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Svend Aage Ellefsen.

Nei atkvøddu: Adolf V. Hansen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Bech, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Edmund í Garði, Ivan Johannesen, Dánjal P. Dalbø, Jacob Lamhauge, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Anfinn Kallsberg og Eilif Samuelsen.

Uppskot frá sama minniluta fall við 7-0. Uppskot frá minniluta (Jørgen Thomsen) fall við 15-0.

---

27. Broyting í lógunum um almenna forsorg, fólka-, avlamis- og einkjupensjón v.m.

Ár 1981, mikudagin 9. september legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at uppskot til broyting í lógunum um almenna forsorg, fólka-, avlamis- og einkjupensjón v.m. verða løgd fyri løgtingið og fólkatingið nú beinanvegin, soleiðis at tær broytingar, sum semja er við rikisnyndugleikarnar um at fremja, fáa gildi frá 1. apríl 1981.

Viðmerkingar:

Við løgtingsmáli nr. 35/1980 legði javnaðarflokkurin hetta mál fram 16. februar í

ár. Málið varð ikki samtykt við ti grundgeving frá landsstýrinum og meirilutanum, at peningur ikki var tøkur til hetta, og at málið ikki var greitt frá ríkismyndugleikunum.

Við at granska fylgisskjølini til løgmansrøðuna á ólavsøku finna vit fram til:

1. At á fundi í felags sosialu nevndini 30. september og 1. oktober 1980 komu donsku luttakararnir við ti boði frá hægri myndugleikum, at meirútreiðslan hjá ríkinum til almannaveitingar í Føroyum kundi verða upp til 9 mió. kr. hægri árliga.
2. AT danska almannaráðið í skrivi til almannastjóran dagfest 5. december 1980 hevur orðað tey endaligu uppskotini til broyting í teimum sosialu lógunum.
3. At almannastovan í skrivi til landsstýrið dagfest 20. februar 1981 mælir til, at landsstýrið tekur av uppskotinum ella tilboðnum frá ríkismyndugleikunum.

Hetta prógvar heilt týðuliga, at allar grundgevingarnar hjá landsstýrinum og meirilutanum fyri at fella uppskot javnaðarfloksins í seinastu tingsetu, vóru falskar. Hetta var heldur eitt lið í sparipolitikkinum hjá sitandi landsstýri og sitandi samgongu.

Vísandi til, at ríkiskassin hevur sín part av meirútreiðslunum uppá 9 mió. kr. tøkar í hesum ári, at fíggjarlógin 1981/82 væntandi fer at geva eitt avlop uppá 49 mió. kr. og at tingið í gjár samtykti inntøkulógir, ið væntandi fara at geva landskassanum eina meirinntøku uppá meira enn 50 mió. kr. árliga, loyvir javnaðarflokkurin sær at seta uppskotið fram aftur.

Skotið verður upp, at broytingarnar og hækkingarnar fáa gildi frá 1. apríl 1981, soleiðis at pensiónistar fáa goldið aftur virkandi fyri tíðina, sum farin er.

Uppskot javnaðarfloksins í løgtingsmáli nr. 35/1980 og upprit frá Almannastovuni viðvíkjandi broytingum í almannalóggávuni, dagfest 20. februar 1981 eru viðløgd sum skjøl í hesum máli.

Sí skjal 5
Viðv. Løgtingsmáli nr. 35/1980
Sí Løgtingstíðindi 1980 bls. 225.

1. viðgerð 14. september. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 22. januar 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 14. september 1981 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið snýr seg um hækking í upphæddunum til tey, sum fáa fólka-, avlamis- og einkjupensjón og hjálp eftir reglunum um almenna forsorg.

Grundgevingin fyri uppskotinum er, at longu í oktober 1980 gjørdi táverandi landsstýri samju við ríkisstjórnina um hækking av nevndu veitingum. Tí verður eisini skotið upp, at broytingarnar fáa gildi frá 1. apríl 1981.

Undir 1. viðgerð upplýsti landsstýrismaðurin í sosialmálum, at núverandi landsstýri arbeiddi við málinum og skuldi samráðast aftur við ríkisstjórnina. Hesar samráðingar hava síðani verið, og landsstýrið fer í næstu framtíð at leggja uppskot um hækkingarnar fyri tingið.

Málið er eisini fráboðað fólkatinginum til framløgu.

Ein meiriluti í nevndini (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe, Fredrik Olsen) setir til einki uppskot fram.

Ein minniluti (Hilmar Beck og Karin Kjølbro) tekur undir við uppskoti javnaðarflokksins.

Ein samd nevnd viðmerkir annars, at tørvur nú er á at kanna sosialu veitingarnar sum heild. Her verður hugsað um tær veitingar, sum koma undir heitini:

1) fólkapensjón,
2) avlamispensjón,
3) einkjupensjón,
4) einkjuhjálp,
5) onnur almenn forsorg,
6) medicinhjálp,
7) persónligt iskoyti til pensjónir.

Eisini verður hugsað um praktiseringina av framskundaðari fólkapensjón og yvirgongdina frá avlamispensjón til fólkapensjón. Skattaviðurskiftini og aðrir inntøkumøguleikar hjá pensjónistum hava eisini stóran týdning at verða kannaðir.

Út frá hesum viðmerkingum setir sosiala nevndin fram

I UPPSKOT
til
samtykt

Landsstýrið í samráð við sosialu nevndina setir eina skjótt arbeiðandi nevnd at kanna núverandi sosialu veitingarnar og kemur við uppskoti um betran og einfaldgerð av reglunum hesum viðvíkjandi.

Undir viðgerðini av hesum máli hevur nevndin eisini umrøtt onnur viðurskifti serliga hjá teim eldru, til dømis bústaðarviðurskifti, inntøkuviðurskifti, arbeiðsviðurskifti, frítíðar- og aldursrevsviðurskifti, heilsuviðurskifti og líknandi sum serliga ger seg galdandi hjá hesi fólk, tá tey koma upp í aldurin.

Nevndin er samd um, at brúk er fyri at klárleggja tann hjálpitørv, ið tey eldru hava á hesum økjum. Út frá hesum setir ein samd nevnd ti fram hetta

II UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta eina nevnd við tí endamáli at kanna umstøðurnar hjá teim eldru í Føroyum og bøta um viðurskifti teirra. Nevndin eigur at verða liðug við sítt arbeiði áðrenn ólavsøku 1983.

2. viðgerð 5. februar. Uppskotið frá javnaðarflokkinum fall við 12-0 atkvøðum. Uppskotini til samtyktar I og II frá samdari nevnd vórðu bæði samtykt við 27-0 atkvøðum.

---

28. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann

Ár 1981, mikudagin 9. september varð boðað frá fyrispurningi frá Adolfi Hansen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Kunnu 26 kommunur innan IRF skuldbinda 11 aðrar kommunur innan sama felagsskap við milliónaupphædd, uttan at hesar 11, hvør sær, við einum meiriluta á bygdaráðsfundi góðkenna skuldbindingina eisini at galda teirra kommunu.

2. Eru lógarbroytingarnar í § 4 í lógum IRF's gildugar, *áðrenn* tær eru góðkendar av hvørji kommunu í felagsskapinum sær.

3. Um ein ella báðir av omanfyri nevndu spurningum verða svaraðir noktandi, er landskassin tá leysur av skyldum sínum hvat 30 millióna-veðhaldi fyri I.R.F. viðvíkur.

Viðmerkingar:

Eitt kommunustýri er hægsta demokratiska vald í eini og hvørji kommunu.

Kommunufelagið eins væl og Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF eru nevndir undir kommununum á sama hátt sum til dømis landsstýrið er ein nevnd ella eitt »stýri« undir løgtinginum.

Landsstýrið kann ikki binda nakra skuld ella útreiðslu á fólkið, uttan at løgtingið heimilar hesum. Tað er ikki nokk, at t.d. eitt umboð fyri hvønn flokkin sigur gott fyri hesum.

Á sama hátt er á tí kommunala økinum. Hvørki kommunali felagsskapurin ella IRF binda nakra kommunu fíggjarliga. Hesi kunnu skjóta upp fyri kommunustýrinum at gera so ella so, men kunnu undir ongum umstøðum áleggja kommunustýrinum at gera nakað.

Heldur ikki kann ein meiriluti av kommununum áleggja einum minniluta av kommununum nakað. Her galda reglurnar, um at meirlutin ræður, ikki. Tí kommunurnar eru sum kunnugt suverænar við tað, at stýrini eru fólkavald. Suverænitetin kunnu sjálvt ikki kommunalir felagsskapir røra við.

Men hetta var, eftir hvat ið eg havi kunnað eftirkannað, jóst hvat ið hendi 5. juni 1981 á aðalfundi hjá IRF.

Her møttu umboð fyri 26 av 37 kommunum upp. Umboðini høvdu fulltrúarváttanir, men til hvat. Hvussu nógv heimilaðu hesar váttanir teimum møttu umboðunum?

Undir ongum umstøðum heimilaðu tær umboðunum at seta kommunurnar, møttar sum ómøttar, í eitt fíggjarligt hall hvørki við 10 - 100 - 1000 ella 10.000 kr. pr. borgara.

Suverænitetarin er ókronkiligur.

Tílíkar avgerðir kunnu bert takast av kommunustýrinum sjálvum og hvørjum stýri sær. Tann lógarbroyting í § 4, sum fór fram, har nýtt stykki 2 og 3 vórðu viðtikin, er ikki galdandi fyri nakra kommunu, fyrrenn hon er samtykt av hvørjum kommunustýri sær, og er tá bert galdandi fyri tær kommunur, sum við einum meiriluta samtykkja broytingina.

9. sept. varð við 24 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

11. november svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður fyrispurninginum.

SVAR

Adolf V. Hansen, løgtingsmaður hevur 9. september 1981 sett mær hesar fyrispurningar í nevnda løgtingsmáli:

1. Kunnu 26 kommunur innan IRF skuldbinda 11 aðrar kommunur innan sama felagsskap við milliónauppheedd, uttan at hesar 11, hvør sær, við einum meirilúta á bygdaráðsfundi góðkenna skuldbindingina eisini at galda teirra kommunu.

2. Eru lógarbroytingarnar í § 4 í lógum IRF's gildugar, *áðrenn* tær eru góðkendar av hvørji kommunu í felagsskapinum sær.

3. Um ein ella báðir av omanfyri nevndu spurningum verða svaraðir noktandi, er landskassin tá leysur av skyldum sínum hvat 30 millióna-veðhaldi fyri IRF viðvíkur.

ad fyrispurningi 1.

L/f Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stuttstavað IRF er eitt lutafelag, har allar kommunur kunnu gerast limir og harvið lutaeigarar. Skuldbinding IRF's er fyri limirnar viðvíkjandi útreiðslum til rentur og avdrátt av lánum avmarkað til pro rata skuldbinding í mun til ibúgvaratalið. Um kommuna uppsigur limapart av rentu og avdrátti av teimum lánum, sum tikin eru, meðan hon var limur og av teimum lánum, ið vóru tikin, tá hon gjørdist limur. Kommuna kann ikki gera seg leysa av felagsskapinum, fyrr enn hon hevur verið limur í 10 ár.

Tað sum her er greitt frá, er tikið úr viðtøkunum hjá IRF.

Kommuna, ið er ella gerst limur av IRF, hevur givið ella gevur seg við limaskapinum undir tær viðtøkur, ið galdandi eru fyri felagsskapin, herundir eisini reglurna um lán, ið tikin verða, og í hvønn mun limur ella lutaeigari bindur seg til at rinda hesa skuld aftur. Kommunan hevur í avgerðini at gerast limur givið eitt part av sínum avgerðarrætti til felagsskapin, og harvið givið seg undir tær avgerðir, felagsskapurin eftir sínum viðtøkum tekur.

ad fyrispurning 2.

Viðtøkurnar siga, at á aðalfundi verða øll mál avgjord við vanligum meiriluta, soleiðis at limirnir hava eins nógvar atkvøður, sum íbúgvatalið er í kommununni. Til broyting í viðtøkunum krevst tó, at í minsta lagi 3/4 av atkvøðuberataliðnum er umboðað og at 3/5 av greiddum atkvøðum eru fyri broytingini.

Av [illegible] 27.872 vóru á fundi, [illegible] einnaleið samtykt.

Broytingin er so stuttligt samtykt og til bindandi fyri allar limakommununurnar eisini fyri tær, ið ikki vóru á fundi.

ad fyrispurning 3.

Við svarinum uppá fyrispurningar 1 og 2 verður hesin fyrispurningur bildin burturdottin.

---

29. Pensjónsaldur hjá sjófólki

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburð- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi:

UPPSKOT
til
samtyktar

Føroya løgting áleggur landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot um at lækka pensiónsaldurin hjá føroyskum sjófólki, t.v.s. fiski- útróðrar og sjómonnum/kvinnum, eftir fylgjandi ætningslinjum:

Pensiónsaldurin hjá føroyskum sjófólki lækkar við einum ári hvønn 1. januar, fyrstu ferð 1. januar 1982, til hann í 1988 er vorðin 60 ár, tó treytað av, at viðkomandi hevur verið sjófólk 4 ferðir so nógv ár sum pensiónsaldurin lækkar.

Aftaná 1988 verður pensiónsaldurin hjá sjófólki tann sami sum hjá øðrum, uttan tó við eini lækking uppá 3 mánaðir fyri hvørt árið viðkomandi hevur verið sjófólk.

Sigling við ikki føroyskum skipum/bátum verður bert tikin við í tann mun skattarin er tilfallin Føroyum.

Viðmerkingar:

Tað hava verið mong vøkur orð at hoyra frá tingsins røðarapalli og aðrastaðir við um okkara sjófólk, eins og mong gylt lyftir eru givin teimum fyri teirra stóra lut í okkara framburði. Men eingin saknur ella oyðiløgd heilsa verður bøtt av berum orðum og gyltum lyftum.

Flestu sjófólk vildu heldur verið heima, men okkara vinnuliv er soleiðis háttað, at ein stórur partur má sigla fyri at restin av vinnutólunum eins og samfelagið sum heild skal ganga.

At fara til skips er ein dreymur hjá flestu ungum dreingjum, og tað er bæði gott og sunt hjá einum og hvørjum ungdómi at vera burtur eina tíð.

Men vit megu siggja í eyguni, at tann, ið fær í sín lut at baldrast á sjónum mesta partin av arbeiðsárum sínum, má líða nógvan sakn, verður skjótari uppslitin og/ella óarbeiðsførur og kann í nógv minni mun enn onnur njóta gott av tí, ið samfelagið og einstaklingurin hevur at bjóða uppá til gamans og álvara.

Sjófólk fær ikki tikið so nógv lut í familjulívinum sum onnur. Siggja lítið til sín hjúnafelag, børn og barnabørn. Eru sjáldan við til tær hugnaløtur sum hoyra familjum til, so sum føðingardagar, dóp, konfirmatiónir, brúdleyp og annað mangt sum heimafólk ikki vil vera fyri uttan. Heldur ikki ber teimum altíð til at vera saman við sínum kæru, tá aðrir tilburðir, eitt nú sjúkur, vanlukkur, deyðsføll og jarðarferðir fara fram innan familjuna.

Sjófólkið kann ikki í sama mun sum onnur njóta tær hentleikar og møguleikar samfelagið og einstaklingurin hava at bjóða uppá. Her verður hugsað um vegir, biografar, dansihølir, ítróttarhallir, kirkjur og onnur samkomuhús, dag- ella kvøldskúlar umframt bløð, útvarp, sjónvarp og annað mangt, sum onnur kunnu njóta dagliga, um tey ynskja tað.

Sjófólkið fær ikki dagliga fylgt við í tí, sum rørist og bylgist í samfelag okkara, fær ikki umskúla seg á skeiðum og kvøldskúlum í sama mun sum onnur, og verður tí mangan verri fyri enn onnur um og tá heilsan tvingar tey í land.

Men fyri føroyingar og Føroyar var, er og verður neyðugt at sigla.

Tí verður her skotið upp at geva okkara sjófólki eitt lítið plástur á tey mongu sár, lívið á sjónum hevur givið teimum, harav mong eru og verða ólíkjandi.

1. viðgerð 11. november. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 22. januar 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og varð við 1. viðgerð 11. november 1981 beint í sosialu nevndina.

Í álitinum til tingmál nr. 27 hevur sosiala nevndin uppskot at seta eina nevnd at

kanna sosialu veitingarnar sum heild, herundir eisini spurningin um pensión áðrenn tíðina til fólk við niðurslitandi arbeiði.

Ein samd nevnd visir ti til hetta álit.

2. viðgerð 5. februar. Uppskotið frá Framburðs- og fiskivinnuflokkinum fall við 13-0 atkvøðum.

---

30. Gjalds- og rentuskyldur Lønjavningargrunns Skipsfiskimanna

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Adolf V. Hansen vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um gjaldsfreist og rentuskyldur Lønjavningargrunn skipsfiskimanna.

§ *1.* Hat útróðrarmenn, fiskimenn bátar ella skip sambært lóg fáa ein part av inntøkuni goldna um Lønjavningargrunn skipsfiskimanna, hevur hesin skyldu at gjalda upphæddina í seinasta lagi ein mánað eftir landing ella eftir dagfesting av skjali, ið er grundarlag undir upphæddini, ið gjaldast skal, um ikki styttri freist er fyriskrivað.

§ *2.* Er upphæddin ikki goldin til tíðina

lagtingslov om betalingsfrist og renteforpligtelser for Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna.

§ *1.* Hvor hjemmefiskere, fiskere både eller skibe i henhold til lov får en del af indtægten betalt over Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna, har denne pligt til at betale beløbet senest en måned efter landing eller datering af det dokument, der danner grundlag for beløbet, der skal betales, med mindre kortere frist er foreslået.

§ *2.* Er beløbet ikke betalt til tiden i

sambært § 1 í hesi lóg skal Lønjavningargrunnur skipsfiskimanna, uttan áheitan, tilskriva upphæddini somu rentu sum galdandi er fyri gjaldkomnan skatt.

2. stk. Rentur sambært 1. stk. verða tilskrivaðar pr. byrjaðan mánað og útgoldnar saman við upphæddini.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1982.

henhold til § 1 i denne lov, skal Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna uden anmodning tilskrive beløbet samme rente, som er gældende for forfalden skat.

Stk. 2. Renter i henhold til stk. 1 skal tilskrives pr. påbegyndt måned og udbetales samtidig med beløbet.

§ 3. Denne lov træder i kraft 1. januar 1982.

Viðmerkingar:

Tað er heilt burturvið, at lønjavningargrunnurin ikki roknar rentur, tá útgjaldingarnar eru so nógv seinkaðar sum mangan hevur verið tilfellið seinastu mongu árini.

Tá peningur manglar í landskassanum, eru tað altíð fiski- og útróðrarmenn eins og skip og bátar, ið skulu bíða eftir tí parti av peningi teirra ið landskassin um lønjavningargrunnin skal gjalda teimum, meðan onnur, teirra millum løgtings- og landsstýrismenn, fáa teirra landskassapart av lønini goldnar næstan 1 viku áðrenn lønarmánaðurin byrjar.

Tað má tí sigast at vera høpisleyst, tá t.d. lønjavningargrunnurin vegna vána likvititet landskassans skyldar einum fiskimanni tiggjutúsundar av krónum og harvið tvingar viðkomandi fiskimann eina skattaeftirstøðu svarandi til somu upphædd, at landskassin tá skal kunna vinna 1% pr. mánað frá sama fiskimanni av ti upphædd, landskassin skyldar fiskimanninum.

Á henda hátt kann landskassin í veruleikanum, við bert at seinka gjaldingini til lønjavningargrunnin, útvega sær eina eykainntøku í form av straffrentu, sum fiski- og útróðrarmenn saman við skipum og bátum megu gjalda.

Umframt nevndu 1% straffirentu má havast í huga, at skip og bátar mangan megu skylda tann ógoldna rakstrarstuðningin til útgerðar- og reiðskapsútvegamenn sum í fleiri førum taka uppí 2% pr. mánað í rentu.

Tí verður her skotið upp at landskassin skal nýta sama rentupolitikk mótvegis ognarum sum skuldarum.

1. Viðgerð 11. november. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 24. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokki 14. september 1981 og undir 1. viðgerð 11. november 1981 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Adolf V. Hansen, Ove Mikkelsen, Jørgen Thomsen, Arnfinn Kallsberg og Øssur Dam Jacobsen) er av teirri áskoðan, at reglan í § 1 um skyldu Lønjavningargrunsins at gjalda upphæddina í seinasta lagi 1 mánað eftir landing eftir dagfesting av skjali, ið er grundarlag undir upphæddini, ið gjaldast skal, eigur at verða broytt soleiðis, at í staðin fyri orðingin leypandi mánaður + 30 dagar, eftir at seðilin er komin Lønjavningargrunninum í hendi.

§ 2, 2. stk. fellur burtur, og tekur meirilutin undir við uppskotinum hjá Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokki við omanfyri nevndu broyting.

Samsvarandi omanfyri standandi setir meirilutin til uppskotið frá Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

1) Í § 1 verður orðingin »ein mánað eftir landing ella eftir dagfesting av skjali, ið er grundarlag undir upphæddini, ið gjaldast skal, um ikki styttri freist er fyriskrivað.« broytt til: »leypandi mánað + 30 dagar eftir at seðilin er komin Lønjavningargrunninum í hendi.«

1) I § 1 ændres formuleringen »en måned efter landing eller datering af det dokument, der danner grundlag for beløbet, der skal betales, med mindre kortere frist er foreslået.« til : »løbende måned + 30 dage efter at seddelen er kommet Lønjavningargrunnurin i hænde.«

2) § 2, 2. stk. verður strikað.

2) § 2, stk. 2 udgår.

Minnilutin (Ivan Johannesen og Hilmar Kass) tekur ikki undir við uppskotinum, men mælir til, at landsstýrið skipar so fyri, at Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna fær pening goldnan, so hann kann halda gjaldsskyldur sínar.

2. viðgerð 24. apríl. Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini til § 1 samtykt við

21-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 21-0. Broytingaruppskot til § 2 samtykt við 21-0, § 2 soleiðis broytt samtykt við 21-0.

FL, j.nr. 1517-2-1. Lóg nr. 59 frá 6. mai 1982.

---

31. Løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um sjónvarp.

§ *1.* Løgtingið hevur einkarætt til sjónvarpssendingar.
2. stk. Gjørt verður sendinet og sjónvarpsstova. Landsstýrinum verður heimilað at taka tørvandi lán til tess.
3. stk. Stovnurin verður nevndur: Sjónvarp Føroya.

§ *2.* Landsstýrið setur fyristøðumann, ið hevur dagligu leiðslu sjónvarpsins um hendi eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetur.

2. stk. Landsstýrið setur starvsfólk sjónvarpsins eftir tilmæli fyristøðumansins. Lønir hjá fyristøðumanni og starvsfólki verða ásettar av landsstýrinum.

lagtingslov om fjernsyn.

§ *1.* Lagtinget har eneret til fjernsynsudsendelser.
Stk. 2. Der oprettes sendenet og fjernsynsstudie. Landsstyret bemyndiges til at optage dertil nødvendige lån.
Stk. 3. Institutionen nævnes: Sjónvarp Føroya.

§ *2.* Landsstyret ansætter en driftsleder, der forestår fjernsynets daglige ledelse efter reglement, fastsat af landsstyret.

Stk. 2. Landsstyret ansætter fjernsynets personale efter indstilling fra driftslederen. Driftslederens og personalets lønninger fastsættes af landsstyret.

§ *3.* Sendinetið hevur Telefonverk Føroya Løgtings um hendi.
2. stk. Nýbyggjan verður fyriskipað av landsstýrinum og goldin av landskassanum. Raksturin verður borin av sjónvarpinum.

§ *4.* Til sjónvarpið skal gjald rindast av hvørjum sjónvarpsmóttakara í landinum og umborð á skipum, ið eru skrásett í Føroyum.
2. stk. Landsstýrið fyrisetur gjaldið fyri eitt ár í senn eftir tilráðing figgjarnevndarinnar.
3. stk. Eingin má sela sjónvarpsmóttakara til, fyrr enn hann er fráboðaður Sjónvarp Føroya og gjaldið goldið. Sjónvarpsmóttakari, sum ikki er fráboðaður, kann koma undir konfiskatión og verður seldur til fratna fyri sjónvarpið.
4. stk. Landsstýrinum er heimilað at fyriseta gjøllari reglur um gjaldskyldu og innheinting av gjøldum, innsigling av móttakarum fyri eftirstøður og panting.
5. stk. Landsstýrið kann treyta teimum, ið selja ella leiga sjónvarpsmóttakarar at uppgeva, hvørjum teir selja ella leiga sjónvarpsmóttakara.
6. stk. Eigari av sjónvarpsmóttakara, sum selur ella á annan hátt letur hann av hendi, skal samstundis boða sjónvarpinum frá og uppgeva navn keypara ella móttakarans og bústað teirra.
7. stk. Skiftir eigari bústað, skal hann samstundis boða sjónvarpinum frá.
8. stk. Landsstýrinum er heimilað at undantaka blindum og dulum at lata gjald.

§ *5.* Fyristøðumaðurin ger uppskot til

§ *3.* Telefonverk Føroya Løgtings har ansvaret for sendenettet.
Stk. 2. Nyanlæg forestås af landsstyret og afholdes af landskassen. Driften afholdes af fjernsynet.

§ *4.* Til fjernsynet svares afgift af hver fjernsynsmodtager i landet og ombord i skibe, der er registreret på Færøerne.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter afgiftens størrelse et år ad gangen efter finansudvalgets indstilling.
Stk. 3. Ingen må tilslutte en fjernsynsmodtager, før denne er anmeldt til Sjónvarp Føroya og afgiften betalt. Fjernsynsmodtager, der ikke er anmeldt kan konfiskeres og sælges til fordel for fjernsynet.
Stk. 4. Landsstyret bemyndiges til at foreskrive nærmere bestemmelser vedrørende afgiftspligt og opkrævning af afgifter, forsegling af modtagere for restancer og vedrørende udpantning.
Stk. 5. Landsstyret kan pålægge den, der sælger eller lejer fjernsynsmodtager at opgive til hvem de sælger eller lejer fjernsynsmodtagere.
Stk. 6. Den, der sælger eller på anden måde afhænder sin fjernsynsmodtager, skal samtidig meddele dette til fjernsynet og opgive køberens eller modtagerens navn og bopæl.
Stk. 7. Skifter ejeren bopæl, skal han samtidig underrette fjernsynet.
Stk. 8. Landsstyret bemyndiges til at fritage blinde og døve for at svare afgift.

§ *5.* Driftslederen udarbejder forslag

fíggjarætlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið.
2. stk. Inntøkur sjónvarpsins verða bert at nýta til sjónvarpsendamál.

§ 6. Fyri sjónvarpið verður lóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd, sum hon er og verður broytt at galda tilsvarandi, eins og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar. Formaðurin í útvarpsnevndini er eisini formaður í sjónvarpsnevndini, hinir limirnir í útvarpsnevndini kunnu ikki samstundis verða limir í sjónvarpsnevndini.

§ 7. Sjónvarpið hevur sama rætt sum telefonverkið at leggja tørvandi leidningar í jørð og til bygningar. Ongum er heimilað at leggja nýggjar leidningar, so teir nerva leidningar sjónvarpsins ella tól, sum standa í samband við teir.
2. stk. Landsstýrið avgerð stríð um tílík mál.

§ 8. Hevur persónur ella kommuna elleidningar ella tól, sum skapa trupulleikar fyri nýtslu sjónvarpsins, er sjónvarpinum heimilað fyri rokning eigarans at gera tørvandi fyriskipanir at byrgja fyri tílíkum.
2. stk. Tað er loyvt eftirliti sjónvarpsins í eftirlitsørindum at fara um annan mans grund og inn í hús, men má tá sigast frá frammanundan.
3. stk. Kunngerð viðvíkjandi útvarpsóljóði verður eisini at galda fyri sjónvarpið. Somuleiðis verður eftirlit útvarpsins eisini at umfata sjónvarpið.

til budget for det kommende finansår og tilstiller landsstyret forslaget.
Stk. 2. Fjernsynets indtægter må udelukkende anvendes til fjernsynsformål.

§ 6. For fjernsynet gælder lov nr. 11 af 14. februar 1957 om radioudvalg, som den er og senere ændres, og reglement om radioudvalgets virksomhed. Formanden for radioudvalget er også formand for fjernsynsudvalget, de andre medlemmer i radioudvalget kan ikke samtidig være medlemmer af fjernsynsudvalget.

§ 7. Fjernsynet har samme ret som telefonvæsenet til at nedlægge nødvendige jordledninger og til at fastgøre ledninger til bygninger. Det er ikke tilladt at lægge nye ledninger, således at disse er til gene for fjernsynets ledninger eller anlæg, der står i forbindelse med disse.
Stk. 2. Landsstyret afgør uoverensstemmelser vedrørende sådanne sager.

§ 8. Har person eller kommune elektriske ledninger, der forstyrrer benyttelsen af fjernsynet, er dette bemyndiget til for ejerens regning at foretage nødvendige foranstaltninger for at forebygge forstyrrelsen.
Stk. 2. Fjernsynets tilsynsmænd har ret til i tilsynsøjemed at færdes på anden mands ejendom og har adgang til huse, men de skal give meddelelse herom i forvejen.
Stk. 3. Bekendtgørelse vedrørende radiofonstyrrelser skal også gælde for fjernsynet. I givet fald skal radiofoniens tilsyn også omfatte fjernsynet.

§ 9. Í kirkjur, sjónleikarhús, samkomuhús, skúlar, veitingarhús og rúm, sum annars verða nýtt til almennar skemtanar ella fundir, skal sjónvarpinum verða heimilað uttan endurgjald at leggja tørvandi leidningar í sjónvarpsendarnáli.

2. stk. Heimilað er sjónvarpinum at sleppa at upptaka og varpa út uttan endurgjald:

a) guðstænastur og fyrilestrar, sum tað almenna stílar fyri ella gevur studning til,
b) almennar fundir.

§ *10.* Felagsútbúnaður og annar kaðal útbúnaður ætlaður at veita sjónvarpssendingar til privatar íbúðir eru bert loyvdar at endurgeva sendingar frá Sjónvarpi Føroya og beinleiðis móttiknar sendingar úr útlondum.

2. stk. Skráirnar verða at endurgeva óbroyttar og samstundis við, at tær verða útvarpaðar.

3. stk. Landsstýrinum er heimilað at gera frávik frá reglum í 1. stk.

§ *11.* Brot móti hesi lóg koma undir sekt. Málini verða framd sum løgreglumál, tó so at reglurnar í rættargangslógini deild 68 og 69 verða tilsvarandi nýttar sum í málum, statsadvokaturin fremur.

2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at royna at fremja mál um brot móti lógarinnar § 4 sum fyrisitingarmál.

§ *12.* Landsstýrið fær heimild at geva undantaksloyvi fyri innflutningsgjøld og valutagjald av tólum til sjónvarpið.

§ 9. Fjernsynet skal være bemyndiget til uden vederlag at nedlægge de i fjernsynsøjemed nødvendige ledninger i kirker, teatre, forsamlingshuse, skoler, restaurationer og lokaler, der iøvrigt benyttes til offentlige forlystelser eller møder.

Stk. 2. Fjernsynet er berettiget til uden vederlag at optage og udsende:

a) gudstjenester og foredrag, som det offentlige foranstalter eller yder tilskud til,
b) offentlige møder.

§ *10.* Fællesantenneanlæg og andre kabelanlæg beregnet til fjernsynsudsendelser til privatbeboelse må kun benyttes til at genudsende udsendelser fra Sjónvarp Føroya og direkte modtagne sendinger fra udlandet.

Stk. 2. Programmerne skal genudsendes uforandrede og samtidig med at udsendelsen finder sted.

Stk. 3. Landsstyret bemyndiges til at meddele undtagelse fra bestemmelsen i stk. 1.

§ *11.* Overtrædelser af denne lov straffes med bøder. Sagerne behandles som politisager, dog således at reglerne i lov om rettens pleje kapitel 68 og 69 finder anvendelse som i sager, der forfølges af statsadvokaten.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til at søge sager angående overtrædelser af lovens § 4 afgjort administrativt.

§ *12.* Landsstyret bemyndiges til at meddele fritagelse for indførselsafgifter og valutaafgift af materiel til fjernsynet.

§ *13.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, samstundis fer løgtingslóg nr. 95 frá 1. november 1978 um stovnan av sjónvarpi úr gildi.

§ *13.* Denne lov træder i kraft straks og samtidig ophæves lov nr. 95 af 1. november 1978 om etablering af fjernsyn.

Viðmerkingar:

Gongdin í sjónvarpsmálinum hevur stutt verið henda:

27. mars 1969 leggur landsstýrið fyri tingið uppskot til løgtingslóg um stovnsetan av sjónvarpi. Við uppskotinum liggur nágreinilig kostnaðarmeting 4 ár fram, sí Løgtingstíðindi 1968, bls. 294-302. Uppskotið fall.

28. august 1970 samtykkir løgtingið uppskot frá landsstýrinum til løgtingslóg um at seta 5-mannanevnd at fyrireika sjónvarp í Føroyum, sí Løgtingstíðindi 1970, bls. 57-58. 2 ár seinni, 20. november 1972, kemur drúgvt álit frá hesi nevnd.

2. apríl 1976 samtykkir løgtingið soljóðandi uppskot til samtyktar:

1. Løgtingið tekur ta principiellu støðu, at sjónvarp skal setast á stovn.
2. Løgtingið tekur ta støðu, at landsstýrið skal halda fram við kanningunum av sjónvarpsmálinum, soleiðis at fullfiggjað uppskot kann leggjast fyri løgtingið, har eisini spurningurin um sjónvarpshús og rakstur er lýstur, í seinasta lagi 15. august 1976.

Hetta fullfiggjaða uppskot kom ongantíð, men 1. november 1978 kunngjørdi løgmaður løgtinglóg nr. 95 um stovnan av sjónvarpi í Føroyum. Sambært hesa lóg verður landsstýrinum heimilað at byggja 4 navngivnar sendistøðir, men einki er nevnt um sjónvarpsstovu (studie).

Síðan henda lóg kom í gildi, hevur (undanfarna) landsstýrið givið einum tiggju feløgum fyribils sendiloyvi, og sent verður frá 4 støðum: Tórshavn, Vestmanna, Tvøroyri og Vági. Fleiri av nevndu feløgum endursenda programmini úr Tórshavn, soleiðis at rættiliga nógvar bygdir hava møguleika at siggja sjónvarp. Í roynd og veru fara hesar sendingar fram heilt uttan eftirlit.

Telefonverkið hevur eftir boðum (undanfarna) landsstýrisins keypt útgerð til tvær tær størstu støðirnar, sambært løgtingslógina frá 1. november 1978, nevniliga Húsareyn við Tórshavn og Hestin í Suðuroy. Útgerðin er komin, heilt ella partvis sett upp og verður klár at taka í nýtslu til heystar. Støðin á Húsareyni er 10 KW stór, og á Hestinum 200 W.

Útgerðin kostar u. 1,5 mió.kr. Haraftural kemur eykaútgerð, uppsetan v.m. tilsamans 1,5 mió.kr. Samlaða íløgan ialt higartil u. 3 mió. kr.

23. apríl 1969 samtykkir tingið lóg um toll av sjónvarpstólum, sí Løgtingstíðindi 1968, bls. 292-293. Tollurin verður 300 kr. á hvørjum sjónvarpsmóttakara, umframt 30% av virðinum. Hesin peningur skal óskerdur fara í grunn til byggjan av sjónvarpi. Harumframt hevur peningur verið avsettur á fíggjarløgtingslógum at fara í sjónvarpsgrunn, soleiðis at pr. 31. juli 1981 eru í hesum grunnum:

Sjónvarpsgrunnur (toll-lóg nr. 26 frá 1969) ...	kr.	8.347.303,94
Grunnurin til sjónvarpsútbygging	—	2.335.441,14
Tøkur peningur ialt	kr.	10.682.745,08

Hetta er støðan í dag.

Sum tað sæst, hevur gongdin í sjónvarpsmálinum verið heldur tilvildarlig, og støðan er ikki haldbar, hvørki yvir fyri teimum altjóða skyldum, vit hava radiostøðum viðvíkjandi, upphavsrættindum til programmini viðvíkjandi ella mótvegis siggjarunum.

Tað er landsstýrisins metan, at alment sjónvarp eigur at verða sett á stovn, ongantíð ov skjótt.

Sambært ta útbyggingarætlan, sum løgd er við í tingmáli nr. 73 frá 10. mars 1976, sjónvarpsmálið, sí Løgtingstíðindi 1975, bind B, skjal 4, við ajourførdum upphæddum, sí tingmál nr. 81 frá 14. apríl 1978 stovnan av sjónvarpi, Løgtingstíðindi 1977, bind A, bls. 396-405, so er tann stóri parturin av 1. byggistigi nú framdur. Eftir er 2. byggistig, men av ti at ein partur av teirri útgerð, sum feløgini nú hava sett upp, eisini kann nýtast í ti almenna sjónvarpinum, verður mett, at ein íløga uppá u. 3 mió. kr. afturat vil geva øllum bygdunum her á landi møguleika fyri at siggja sjónvarpið.

Við einum árligum sjónvarpsgjaldi uppá kr. 250,00 (sum limagjaldið í Sjónvarpsfelagnum í Tórshavn) verður inntøkan mett til 1,75 milj. kr. árliga og raksturin harvið at bera seg sjálvan.

1. viðgerð 10. november. Málið varð beint í serliga 6-manna nevnd.

Í hesa nevnd vórðu 11. november valdir hesir limir:

Finnbogi Isaksen, Jógvan Sundstein, Flemming Mikkelsen, Adolf Hansen, Atli Dam, Asbjørn Joensen.

24. apríl legði nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 10. november beint í eina serliga 6-manna nevnd.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fundir við ymiskar persónar m.a. umboð fyri Sjónvarpsfelagið í Havn.

Tað stendur nevndini greitt, at aftaná, at privatu sjónvarpsfeløgini nú eina tíð hava staðið fyri regluligum sjónvarpssendingum uttan formaliseraðar avtalur um upphavsrættin og liknandi viðurskifti, er neyðugt, at tað almenna framyvir tekur sær av hesum máli, og er tað tí eisini neyðugt við eini sjónvarpslóggávu.

Soleiðis sum lógaruppskotið og viðmerkingarnar til tað eru formaðar, má metast at virksemið hjá sjónvarpinum at byrja við verður lítið, men skuldi hon fyribils kunna verið ein karmur uttanum eina menning av hesum stovni.

Nevndin setir tí fram hetta

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins.

§ 1, nýtt 4. stk:
»Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru.«

§ 1, nyt stk. 4:
»Sjónvarp Føroya har som formål at sende objektiv, saglig og oplysende nyhedsformidling og iøvrigt udsendelser, der virker bevarende og udviklende for færøsk kultur, tro og morallære.«

§ 2, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Eftir tilmæli frá sjónvarpsnevndini setir landsstýrið í starv ella loysir úr starvi fyrisløðumann, ið hevur dagligu leiðslu sjónvarpsins um hendi eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetir.«

§ 2, stk. 1 får følgende ordlyd:
»Efter indstilling fra fjernsynsudvalget ansætter og afskediger landsstyret en driftsleder, der forestår fjernsynets daglige ledelse efter reglement fastsat af landsstyret.«

§ 3, 1. stk. í føroyska tekstinum verður broytt til:
»Telefonverk Føroya Løgtings hevur sendinetið um hendi.«

§ 4, 8. stk. verður orðað soleiðis:
»Í serstøkum førum kann landsstýrið gera undantak frá at lata gjald.«

§ 4, stk. 8 får følgende ordlyd:
»I særlige tilfælde har landsstyret hjemmel til fritagelse for afgift.«

Í § 5, 1. stk. verður sett aftaná »uppskotið«: »til góðkenningar«.

I § 5, stk. 1 tilføjes efter »forslaget«: »til godkendelse«.

Í § 9, 2. stk. verður sett aftaná »endurgjald«:
»tó eftir loyvi leiðslunnar«.

I § 9, stk. 2 tilføjes efter »udsende«: »dog med ledelsens tilladelse.«

Í § 10, 2. stk. verður orðið »skráirnar« broytt til »sendingarnar«

I § 10, stk. 2, skal ordet »programmerne« ændres til »udsendelserne.«

Við hesum broytingum tekur ein meiriluti (Guttorm Klein, Adolf Hansen, Flemming Mikkelsen og Jógvan Sundstein) undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen) er samdur við landsstýrinum í, at fyri at fáa upphavsrættindini og onnur viðurskifti í rættlag er neyðugt at gera sjónvarpið alment, heldur enn at halda fram við núverandi skipan. Minnilutin heldur tað eisini vera rætt, at løgtingið hevur eftirlit við einum fjølmiðli sum sjónvarpinum, eins og løgtingið hevur eftirlit við útvarpinum.

Peningaliga er lítil munur á einum privatum sjónvarpi og einum almennum. Tað privata sjónvarpið verður í dag goldið av limunum í sjónvarpsfeløgunum. Tað almenna sjónvarpið verður goldið av teimum, sum hyggja — t.v.s. av teimum sonnu fólkunum. Sendinetið verður goldið av tí almenna og haraftrat sjónvarpsstovan, og hetta seinasta ger einasta veruliga munin millum alment og privat sjónvarp, peningaliga sæð.

Tað største spellið við tí núverandi sjónvarpinum er, at ov stórur partur av tilfarinum er útlendskt tilfar, og at tekstirnar ikki eru føroyskar. Tað er torført at meta neyvt um, hvat árin hetta fer at hava á føroyskt mál og mentan sum frálíður, men neyvan verður árinið positivt. Minnilutin heldur tað vera eina megintreyt fyri einum føroyskum sjónvarpi, at

1) í minsta lagi 10 til 15% eru føroyskt framleiddar sendingar, og

2) at allar tekstir skulu vera føroyskar, (tó kunnu sendingar á t.d. donskum og norskum vera uttan tekst).

Minnilutin heldur tað ikki vera rætt at gera sjónvarpið til ein sjálvstøðugan stovn. Undir viðgerðini av málinum er heldur eingin prógvgrund førd fram fyri hesi ætlan. Tað bíligasta hevði verið at ríkið útvarpið og sjónvarpið saman. Fyri ein part er nýggja útvarpshúsið — eftir áheitan frá landsstýrinum og við góðkenning í fíggjarnevndini — bygt til eisini at kunna hýsa sjónvarpinum. Tað tykist minnilutanum heilt ófatuligt, at landsstýrið nú hevur keypt eina ogn á Bryggjubakka til sjónvarpið, sum ikki var hildin at vera nóg góð at hýsa útvarpinum. Skulu nakrar føroyskar sendingar gerast, so krevur eitt sjónvarp størri rúmd og fleiri teknisk tól enn eitt útvarp.

Tað hevði eisini verið ynskiligt, at ein felags leiðsla legði skráirnar hjá útvarpinum og sjónvarpinum, so at sloppið kundi verið undan tí spilli, sum er í dag. Tað hevði eisini verið náttúrligt at havt felags innkrevjing av útvarps- og sjónvarpsgjaldi, felags tekniska umsiting o.s.fr.

Út frá tí, sum er ført fram omanfyri, kann minnilutin taka undir við uppskoti landsstýrisins um at gera sjónvarpið alment, men við tí broyting, at stovnarnir

útvarpið og sjónvarpið verða riknir undir somu leiðslu, og minnilutin setir til fram hetta

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins:

§ 1, 3. stk. fær hetta orðaljóð: »Stovnurin Sjónvarp Føroya verður rikin saman við Útvarpi Føroya.«	§ 1, stk. 3 får denne ordlyd: »Institutionen Sjónvarp Føroya administreres sammen med Útvarp Føroya.«
§ 2., 1. stk. gongur út.	§ 2, stk. 1 udgår.
§ 6 fær hetta orðaljóð: »Útvarpsnevndin virkar yvir sjónvarpinum á sama hátt sum yvir útvarpinum.«	§ 6 får denne ordlyd: »Radionævnet fungerer på samme måde for Sjónvarp Føroya's vedkommende som for Útvarp Føroya.«

Ein annar minniluti (Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskotinum um almennt sjónvarp í Føroyum.

Tað hevur leingi verið meting javnaðarfloksins, at tað bæði er rætt og rimiligt, at tað almenna hevur eftirlit við einum so týðandi upplýsingar- og mentunnarstovni sum sjónvarpinum.

Minnilutin metir, at tað er av stórum týdningi at hesin stovnur fær so góðar umstøður at virka undir sum møguligt, og minnilutin metir, somuleiðis, at skal sjónvarpið fáa menningarligt og upplýsandi týdning, eigur so nógv senditilfar sum møguligt at vera framleitt í Føroyum.

Tað er tí so mikið meira harmiligt, at landsstýrið við uppskoti sínum ikki tykist at ætla sjónvarpinum arbeiðsumstøður til at framleiða sítt egna senditilfar.

Minnilutin kann ikki taka undir við uppskotinum um at skipa sjónvarpið sum ein heilt sjálvstøðugan stovn uttan samband við Útvarp Føroya. Hesir báðir stovnar hava, so ólíkir teir annars eru, góðar møguleikar fyri at samarbeiða á tekniska, umsitingarliga og programliga økinum.

Minnilutin metir tað tí vera rætt at sjónvarpið og útvarpið verða skipað við felags umsitingarligari og tekniskari leiðslu, men at tey samstundis verða skipað við hvør sínari nevnd.

Minnilutin hugsar sær eina skipan við einum felags stjóra og einum programleiðara fyri hvønn stovnin. Virksemið hjá báðum programleiðslum verður at fastleggja í reglugerð, og eiga teir t.d. at hava høvuðsábyrgdina fyri sendingar og virk-

semi annars verður samskipað soleiðis, at tann kapping, sum verður millum báðar stovnar, verður til gagns fyri bæði lurtarar og stovnar.

Út frá hesum setir minnilutin fram hesi

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins:

1) § 2. Landsstýrið setir felags stjóra fyri útvarpi og sjónvarpi Føroya eftir tilmæli frá útvarps- og sjónvarpsnevndini.

   2. stk. Landsstýrið setir eftir tilmæli frá útvarps- og sjónvarpsnevndunum ein programleiðara fyri ávikavist útvarpið og sjónvarpið. Hesir báðir leiðarar hava dagligu leiðsluna av báðum stovnum, herundir hava teir ábyrgd av programløguni.

2) § *6.* Útvarpsnevndin og sjónvarpsnevndin hava hægstu ábyrgd fyri tí, sum sent verður ávikavist í útvarpi og sjónvarpi. Útvarpslógin verður broytt samsvarandi hesum broytingum.

1) § 2. Landsstyret ansætter en fælles direktør for Færøernes Radiofoni og fjernsyn efter indstilling af radiofoni- og fjernsynsudvalgene.

   Stk. 2. Landsstyret ansætter efter indstilling fra radiofoni- og fjernsynsudvalgene en programleder for henholdsvist radiofoniens og fjernsynet. Begge disse ledere har den daglige ledelse af vedkommende 2 institutioner, herunder har de ansvar for programlægningen.

2) § *6.* Radiofoniudvalget har det øverste ansvar for det, som sendes i henholdsvis radiofoni og fjernsyn. Radiofoniloven ændres i overensstemmelse med disse ændringer.

Annars tekur minnilutin undir við uppskotinum og við broytingaruppskotum meirilutans.

2. viðgerð 24. apríl. Atkvøðugreiðsla 27. apríl. Broytingaruppskot frá minniluta-num Finnboga Isaksen § 1, 3. stk. fall við 12-0, § 2, 1. stk. gongur út fall við 12-0, § 6 fall við 6-0. Broytingaruppskot frá minnilutanum Jóannes Dalsgaard § 2, 2. stk. og pkt. 2 fullu bæði við 13-0. Broytingaruppskot frá meirilutа i nevndini § 1, nýtt 4. stk. samtykt við 24-0, § 2, 1. stk. samtykt við 19-0, § 3, 1. stk. samtykt við 23-0, § 4, 8. stk. samtykt við 28 0, § 5, 1. stk. samtykt við 22-0, § 9, 2. stk. samtykt við 20-0, § 10, 2. stk. samtykt við 20-0. Lógaruppskotið soleiðis broytt § 1 samtykt við 22 0, §§ 2 - 12 samtyktar við 19-0 og § 13 samtykt við 19-0.

3. viðgerð 28. apríl. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1910-2 Lóg nr. 77 frá 21. mai 1982.

---

32. Veiði, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt saman við avvarðandi stovnum, ráðum og vinnulívsmonnum at leggja fyri løgtingið, tá ið tað kemur saman aftur í november í ár, miðvísa ætlan um, hvussu veiði, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað, soleiðis at tjóðarbúskapurin fær sum mest burtur úr hesum fiskasløgum.

Viðmerkingar:

Tað verður nú mannað alt meira og meira greitt, at vit í veiði eftir svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski, ið higar til lítið hevur verið roynt eftir, eiga miklar og stórar møguleikar. Av mongum grundum, mest av teimi minkaðu, ið hevur verið í botnfiskistovnunum, er tað bráðneyðugt at láta gongd í hesar vinnuhvørvirnar.

Uppi í hesum spurningi hongur so spurningurin um sjálvan svartkjaftastovnin. Tað eigur tí at verða starvast fyri at fáa ásett TAC fyri henda stovn, samtíðis sum vit vissa okkum rimiligan part — ikki minni enn 500.000 tons árliga — av hesi veiði.

Tingið fer heim í dag og kemur ikki saman aftur fyrr enn í november. Tjóðveldisflokkurin metir, at hetta mál hevur slíkan skund, at løgtingið kann ikki bíða so leingi við at taka stig í tí, og verður tí hetta uppskot lagt fram og mælt til, at tað kemur til viðgerðar og avgerðar longu í dag.

1. viðgerð 14. september. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 23. februar 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er framlagt av tjóðveldisflokkinum 14. september 1981, fekk 1. viðgerð sama dag og varð beint í fiskivinnunevndina.

Skotið verður upp at áleggja landsstýrinum saman við avvarðandi stovnum, ráðum og vinnulívsmonnum at leggja fyri tingið miðvísa ætlan um, hvussu fisking, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað, fyri at tjóðarbúskapurin fær sum mest burturúr hesum fiskasløgum.

Nevndin tekur sjálvsagt undir við endamálinum í hesum uppskoti, men ásannar viðvíkjandi høgguslokki at komið er ikki serliga nógv ávegis, hvussu best er at gera fyri at fáa sum mest burturúr, og tí verður neyðugt fyrst at gera fleiri royndir fyri at finna fram til eina miðvísa framtíðarætlan, og við tað at dagfestingin í uppskotinum til 1. november 1981 er farin, so má hetta broytast.

Herafturat skjýtur nevndin upp, at taka TAC'ið á svartkjaftastovninum við í uppskotinum til samtyktar, og setir tí samd nevnd í staðin fyri upprunauppskotið fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt saman við avvarðandi stovnum, ráðum og vinnulívsmonnum at leggja fyri løgtingið so skjótt til ber og ikki seinri enn 1. november 1982 miðvísa ætlan um, hvussu veiði, virking og søla av svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski best verður skipað, soleiðis at tjóðarbúskapurin fær sum mest burtur úr hesum fiskasløgum, og at streingja á at sett verður TAC á svartkjaftastovnin so skjótt til ber.

26. februar varð til løgtingsins kunningar framlagt notat viðvíkjandi veiðu og framleiðslu burtur úr svartkjafti.

Sí skjal 6.

2. viðgerð seinni sama dag. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1501-15-5.

---

33. Góðskumetingarstovnur

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburðs- og fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um góðskumetingarkærustovn.

§ *1.* Settur verður á stovn góðskumetingarkærustovnur, ið hevur til endamáls at tryggja veiðumonnum, veiðuførum og ráfiskakeyparum eina einsháttaða og rættvísa góðskumeting.

2. stk. Stovnurin kann ógreyta allar avgerðir um góðsku á ráfiski, ið tiknar eru av góðskumetara ella øðrum.

lagtingslov om kvalitetsankeinstitut.

§ *1.* Der oprettes et kvalitetsankeinstitut, som har til formål at sikre fiskere, fiskeskibe og fiskekøbere en ensartet og retfærdig kvalitetsvurdering.

Stk. 2. Instituttet kan ændre alle afgørelser om kvaliteten på råfisk, som er taget af kvalitetsvurdereren eller andre.

§ *2.* Góðskumetingarkærustovnurin hevur skyldu at møta fyri at gera úrskurð um góðskumetingina, tá kæra er av veiðimanni, veiðifari ella ráfiskakeypara, tó við teimum avmarkingum ásettar eru í § 3.

§ *3.* Kæra sambært hesa lóg kann bert fara fram, um munurin av ivametingini minkar manningarpartin við kr. 50 pr. veiðumann pr. veiðudag. Tó kann fiskakeypari ikki kæra, um munurin av ivametingini er undir kr. 10.000.

§ *4.* Góðskumetingarkærustovnurin hevur 5 limir og 5 tiltakslimir, ið verða valdir soleiðis:

Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim og 1 tiltakslim,

Meginfelag Útróðrarmanna velur 1 lim og 1 tiltakslim,

Ráfiskakeyparafelagið velur 1 lim og 1 tiltakslim,

Aðrir ráfiskakeyparar velja 1 lim og 1 tiltakslim í felag og

Føroya Landsstýri velur 1 lim og 1 tiltakslim

2. stk. Teir av landsstýrinum valdu eru formaður og varaformaður og skulu vera biologar ella hava hollan kunnleika til biologi.

3. stk. Eingin limur ella tiltakslimur má vera virkandi góðskumetari. Teir, ið landsstýri velur, megu harumframt

§ *2.* Kvalitetsankeinstituttet har pligt til at møde for at træffe afgørelse om kvalitetsvurderingen, hvis anke er foretaget af fisker, fiskerfartøj eller råfiskekøber, dog med de afgrænsninger, der er fastsat i § 3.

§ *3.* Anke i henhold til denne lov kan kun foretages, såfremt forskellen af den tvivlsomme vurdering formindsker mandskabsandelen med 50 kr. pr. fisker pr. ugedag. Dog kan fiskekøber ikke anke, såfremt forskellen i den tvivlsomme vurdering er under kr. 10.000,-

§ *4.* Kvalitetsankeinstituttet har 5 medlemmer og 5 suppleanter, der vælges således:

Føroya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant,

Meginfelag Útróðrarmanna vælger 1 medlem og 1 suppleant,

Ráfiskakeyparafelagið vælger 1 medlem og 1 suppleant,

Andre råfiskekøbere vælger 1 medlem og 1 suppleant i forening og

Færøernes landsstyre vælger 1 medlem og 1 suppleant.

Stk. 2. De af landsstyret valgte er formand og næstformand og skal være biologer eller have solid kendskab til biologi.

Stk. 3. Intet medlem eller suppleant må være udøvende kvalitetsvurderere. De af landsstyret valgte må desuden

ikki hava beinleiðis áhuga í rakstri av fiskivinnu ella fiskakeypi.

§ 5. Landskassin heldur allar útreiðslur kærustovnsins.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1982.

ikke direkte have interesse i fiskeridrift eller fiskekøb.

§ 5. Landskassen afholder alle udgifter i forbindelse med ankeinstitutter.

§ 6. Denne lov træder i kraft 1. januar 1982.

Viðmerkingar:

Tað kemur ikki so sjálvdan fyri at stríð tekur seg upp um góðskumetingina av ráfiski. Stundum eru tað smáar nøgdir talan er um, men ofta eisini stórir partar av stórum lastum, ið stríð stendst um. Tað hevur fleiri ferðir komið fyri, at skip hava sæð seg noydd at skifta fiskakeypara eina tíð fyri aftur at fáa eina rættvísa viðgerð hvat góðskumeting viðvikir.

Tað má sigast órættvíst at vera, at skip og mannning ikki kunnu kæra eina góðskumeting, ið teir meta vera til fyrimuns fyri tann fiskakeypara, sum lønar góskumetaranum.

Í dag verður farið til maskinurnar at kanna hvussu stórt úrtøkuprosentið er, og verður hetta so nýtt sum grundarlag undir góðskumetingini millum skip og fiskakeypara. Hetta ger at skipini koma at fáa eina minni úrtøku, um t.d. maskinurnar eru illani instillaðar ella ein knívur er óhvassur.

Tað finnast í dag aðrar metodur at góðskumeta fisk uppá, eitt nú Torrymetodan, og er tað hugsanin við hesi lóg, at kærustovnurin skal nýta onnur kriterier og aðrar framgangshættir enn góðskumetingin fer fram eftir í dag.

1. viðgerð 11. november. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 16. mars 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki 14. september 1981 og við fyrstu viðgerð 11. november 1981 beint í fiskivinnunevndina.

Í endamálsgreinini verður skotið upp at seta á stovn ein góðskumetingarkærustovn fyri at tryggja fiskimonnum, fiskiførum og ráfiskakeyparum eina einsháttaða og rættvísa góðskumeting.

Hesin góðskumetingarkærustovnur skal hava 5 limir og 5 tiltakslimir, ið skulu veljast eftir ávisum reglum.

Meirilutin (Fredrik Olsen, Hans M. Joensen, Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg, Tórálvur M. Olsen og Jógvan I. Olsen) førir fram, at góðskumeting av ráfiski fer fram í tí løtu avreitt verður yvir vektina eftir ávisum reglum, av einum góðskumetara, sum stendur undir einum vrakaraeftirlitsmanni og hesin stendur undir yvirvrakaranum.

Um ósemja tekur seg upp og klagað verður til ein góðskumetingarkærustovn, so sum skotið er upp í hesum máli, so metir meirilutin, at hesin kærustovnur ikki kann verða á staðnum fyrr enn dagin eftir, og er tá fiskurin sjálvsagt vorðin ein dag eldri og harvið versnaður, og verður tí mett, at ein slíkur stovnur ikki er nøkur loysn á slíkum ósemjum, og tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum.

Meirilutin er kortini samdur við uppskotsstillaranum í tí, at her er ein trupulleiki, og at virkað eigur at verða fyri at fáa eina meiri einsháttaða góðskumeting enn verið hevur, við t.d. at góðskumetararnir ferðast runt at góðskumeta, og at umhugsað eigur at verða, um góðskumetararnir skulu verða løntir av tí almenna, og setir fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at skipa soleiðis fyri, at vit fáa eina javna góðskumeting av ráfiski kring landið.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

19. mars legði Tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Álagt verður Føroya Landsstýri at gera nýggja reglugerð fyri vrakarastovnin, sum bæði fevnir um góðskumeting og kanning av frystum og saltaðum søluúrdráttum.

Viðmerkingar:

Tjóðveldisflokkurin er samdur við uppskotsstillaran og við meirlutan í fiskivinnunevndini í, at tað við góðskumeting av feskum fiski ofta standast trupulleikar, sum landsstýrið eigur at koma til livs skjótast gjørligt, tjóðveldisflokkurin metir ikki at uppskot nr. 33 ella álitið frá fiskivinnunevndini í sama máli fevna um allar teir trupulleikar, sum eru á hesum øki, hava vit í huga tær stórhendingar, sum eru farnar fram í okkara keyparalondum, her hugsa vit serstakliga um saltfiskin, hvar stórar nøgdir av saltfiski ikki kunnu marknaðarførast, ikki eru mannaføði, sæð við

keyparans eygum, hetta hóast seljarin, her í flestu førum virkini, sita við fult gildugari váttan um, at tann væran, sum avskipað varð, var ein fyrstafloks vøra. Hetta hevur eftir sigandi, í fyrsta umfari givið virkinum eitt samlað tap uppá heilar 8 mió. kr., hetta ber prógv um, at tann váttan, vrakarastovnurin her hevur givið virkinum, als onga ávirkan hevur á marknaðarføringina av okkara fiskavørum, og kundu virkini eins væl verið spard fyri tær útreiðslur, vrakingin hevur givið teimum. Hetta má væl geva landsstýrinum nakað at hugsa um, at ein so stórur og dýrur stovnur sum vrakarastovnurin er, og tað sera týdningarmiklu arbeiðsuppgávu hesin stovnur hevur, í slíkum førum als onga ávirkan hevur á marknaðarføringina av okkara fiskavørum. Vit fara tí at mæla landsstýrinum til, at allir trupulleikar við vrakarastovninum verða tiknir til umhugsunar.

Harumframt vóru feskfiskur og frystar fiskavørur ikki uppá tal, tá reglurnar vórðu gjørdar fyri vrakarastovnin. Í dag er verunleikin tann, at hvørt saltfiskaflak og hvør flaktur fiskur, havdur á hondum av vrakaranum, sum fáa umleið 100 kr. í løn um tíman, hin vegin er kanningin av frystum vøruni latin upp í hendurnar á virkjunum sjálvum og Føroya Fiskasølu, meðan bert einstakir vrakieftirlitsmenn gáa um hesar vørur.

Skipanin av vrakarastovninum er púra avoldað, og nú fólk verða útbúgvin bæði í Íslandi og Noregi serstakliga við góðsku og góðsking fyri eyga, metir tjóðveldisflokkurin, at stundin er komin at endurnýggja, og nútíðargera vrakarastovnin sum heild, tá góðska hevur størri týdning enn nakrantíð.

Tjóðveldisflokkurin setir tí frammanfyri standandi broytingaruppskot.

2. viðgerð 22. mars. Málið varð aftur beint í fiskivinnunevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Málið varð lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 14. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 11. november 1981 beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin viðgjørdi málið og legði álit fram 16. mars 1982. Málið varð sett á dagsskránna 19. mars. Eftir áheitan frá tjóðveldisflokkinum varð 2. viðgerð útsett til 22. mars, tá tjóðveldisflokkurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

»Álagt verður Føroya Landsstýri at gera nýggja reglugerð fyri vrakarastovnin, sum bæði fevnir um góðskumeting og kanning av frystum og saltaðum søluútdráttum.

Viðmerkingar:

Tjóðveldisflokkurin er samdur við uppskotsstillaran og við meirluan i fiskivinnunevndini i, at tað við góðskumeting av feskum fiski ofta standast trupulleikar, sum landsstýrið eigur at koma til livs skjótast gjørligt, tjóðveldisflokkurin metir ikki at uppskot nr. 33 ella álitið frá fiskivinnunevndini i sama máli fevna um allar teir trupulleikar, sum eru á hesum øki, hava vit í huga tær stórhendingar, sum eru farnar fram í okkara keyparalondum, her hugsa vit serstakliga um saltfiskin, hvar stórar nøgdir av saltfiski ikki kunnu marknaðarførast, ikki eru mannaføði, sæð við keyparans eygum, hetta hóast seljarin, her í flestu førum virkini, sita við fult gildugari váttan um, at tann vøran, sum avskipað varð, var ein fyrstafloks vøra. Hetta hevur eftir sigandi, í fyrsta umfari givið virkinum eitt samlað tap uppá heilar 8. mió. kr., hetta ber prógv um at tann váttan, vrakarastovnurin her hevur givið virkinum, als onga ávirkan hevur á marknaðarføringina av okkara fiskavørum og kundu virkini eins væl verið spard fyri tær útreiðslur, vrakingin hevur givið teimum. Hetta má væl geva landsstýrinum nakað at hugsa um, at ein so stórur og dýrur stovnur sum vrakarastovnurin er, og tað sera týdningarmiklu arbeiðsuppgávu hesin stovnur hevur, í slíkum førum als onga ávirkan hevur á marknaðarføringina av okkara fiskavørum. Vit fara tí at mæla landsstýrinum til at allir trupulleikar við vrakarastovninum verða tiknir til umhugsunar.

Harumframt vóru feskfiskur og frystar fiskavørur ikki uppá tal, tá reglurnar vórðu gjørdar fyri vrakarastovnin. Í dag er verunleikin tann, at hvørt saltfiskaflak og hvør flaktur fiskur, havdur á hondum av vrakarum, sum fáa umleið 100 kr. í løn um tíman, hin vegin er kanningin av frystum vørum latin upp í hendurnar á virkjunum sjálvum og Føroya Fiskasølu, meðan bert einstakir vrakieftirlitsmenn gáa um hesar vørur.

Skipanin av vrakarastovninum er púra avoldað og nú fólk verða útbúgvin bæði í Íslandi og Noregi serstakliga við góðsku og góðsking fyri eyga, metir tjóðveldisflokkurin at stundin er komin at endurnýggja og nútíðargera vrakarastovnin sum heild, tá góðska hevur størri týdning enn nakrantíð.

Tjóðveldisflokkurin setur tí fram frammanfyristandandi broytingaruppskot.«

Undir 2. viðgerð varð málið eftir áheitan frá tjóðveldisflokkinum beint aftur í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og mælir ein meiriluti (Frederik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg, Tórálvur Mohr Olsen, Hans M. Joensen og Jógvan Olsen) til í staðin fyri uppskotið til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum og uppskotið til samtyktar í álitið at sett verður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at skipa soleiðis fyri, at vit fáa eina javna góðsku-

meting kring landið, og at endurskoða løggávuna viðvíkjandi vraking av øllum fiski og fiskaúrdráttum.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

Framhaldandi 2. viðgerð 24. apríl. § 1 í uppskotinum fall við 2-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá meiriluta í nevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1515-23

---

34. Frítíðar- og dansiviðurskiftini í høvuðsstaðnum

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Karin Kjølbro, løgtingslimur vegna Erlend Patursson, Jonu Henriksen, Jóannes Dalsgaard og seg sjálvan fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Vísandi til at, at frítíðar- og dansiviðurskiftini hjá ungfólki í Tórshavn framvegis eru óloyst, og vísandi til, at serligi grunnurin, ið hevur til endamáls at veita studning til, m.a. bygda- og ungdómshús er tómur, verður álagt landsstýrinum at veita býráðnum í Tórshavn 1 mió. kr. sum rentufrítt lán til tess at fremja eina fyribilsloysn á hesum viðurskiftum.

Ein 3-mannanevnd við umboði fyri landsstýrið, Tórshavnar býráð og ungdómin í býnum verður sett til at koma við uppskoti um, hvussu spurningurin um frítíðar- og dansiviðurskiftini í høvuðsstaðnum best verður loystur.

1. viðgerð 13. november. Málið varð beint í socialu nevndina, sum 22. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av Erlendi Patursson, Karini Kjølbro, Jóannesi Dalsgaard og Jonu Henriksen.

Málið snýr seg um at veita Tórshavnar kommunu eitt rentufrítt lán uppá 1 mió. kr. til fyribilsloysn av dansiviðurskiftunum í Havn.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe og Frederik Olsen) mælir til at senda landsstýrinum málið til kanningar.

Minnilutin (Karin Kjølbro) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (Sverre Midjord) ásannar, at ungdómurin, serliga á teimum stóru plássunum í støran mun saknar høli, har hann kann koma saman undir tryggum umstøðum til dans og annað fritíðarítriv. Tað má ásannast, at landsmyndugleikar eins væl og kommunalir myndugleikar hava eina stóra ábyrgd av, at Føroya ungdómi stendur annað og betri í boði enn at ganga úti á gøtunum um kvøldarnar.

Tað má sostatt metast at vera beint, at landsmyndugleikarnir so vítt møguligt styðja kommununum í virksemi teirra til tess at geva teimum ungu betri fritíðarkor, sjálvt um fritíðarlógin verður samtykt og ikki minni, um hon ikki skuldi verið samtykt.

Minnilutin kann tó ikki taka undir við uppskotinum hjá teimum 4 suðurstreymoyartingmonnunum, sum tað er orðað av ti, at tað bert viðvíkur einum ávísum plássi í landinum og talan sostatt verður um eitt slag av serlóggávu.

Tað má haldast at vera beint, at skal talan vera um at geva landsstýrinum lánsheimild til tað í uppskotinum nevnda endamál, so má henda heimild vera galdandi fyri alt landið, og mugu allar kommunur hava sama møguleika til at taka hesi lán.

Út frá hesum setir minnilutin fram hetta

UPPSKOT
til

løgtingslóg um at veita kommununum lán til ungdómsarbeiði.

lagtingslov om at yde kommuner lån til ungdomsarbejde.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at veita føroysku kommununum í mesta lagi 2 mió. kr. árliga í rentufrium láni til útvegan av tryggum hølum at nýta í lokala ungdómsarbeiðinum.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at yde de færøske kommuner op til 2 mill. kr. årligt i rentefrit lån til tilvejebringelse af trygge lokaler til brug i det lokale ungdomsarbejde.

§ *2.* Landsstýrið ger reglur fyri, hvussu hesar tvær milliónir verða býttar millum kommunurnar.

§ *2.* Landsstyret fastsætter regler for, hvordan disse to millioner skal fordeles mellem kommunerne.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1983.

§ 3. Denne lov træder i kraft 1. april 1983.

2. viðgerð 23. apríl. Uppskotið fall við 12-0 atkvøðum.

---

35. Menningarhjálp

Ár 1981, mánadagin 14. september legði Karin Kjølbro, løgtingslimur vegna Atla Dam, Jógvan Sundstein, Adolf Hansen og seg sjálvan fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um menningarhjálp.

§ 1. Løgtingið áleggur tinginum at seta 0,1% av bruttotjóðarinntøkuni í grunn til menningarhjálp.

§ 2. Løgtingið velur eina 5-mannanevnd, ið avger, á hvønn hátt og hvar menningarhjálpin skal fara fram.

§ 3. Landsstýrið ger reglugerð í samráð við 5-mannanevndina — fyri grunsins virksemi.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1982.

lagtingslov om udviklingsbistand.

§ 1. Lagtinget pålægger tinget at afsætte 0,1% af bruttonationalproduktet i fond til udviklingsbistand.

§ 2. Lagtinget vælger et udvalg på 5 medlemmer, der afgør, på hvilken måde og til hvem udviklingsbistanden skal ydes.

§ 3. Landsstyret udsteder reglement i samråd med 5-mandsudvalget — for fondets virksomhed.

§ 4. Denne lov træder i kraft 1. april 1982.

Viðmerkingar:

Í farnu viku samráddust fólk úr ríku londunum um menningarhjálp til 30 tey fátækastu londini í heiminum. Tey lond, ið ganga á odda í hesum virksemi, og sum higartil hava vist hin størsta viljan í verki, eru tey lond, sum vit, tá talan er um framburð, vælferð og frælsi, ynskja at verða javnmett við.

Hóast vit í dag kunnu metast sum eitt av ríkastu samfeløgunum í heiminum, so hevur fólk okkara áður kent til ringar tíðir við stríði móti hungri, umfarssóttum og óduarveðri.

Hóast ríkidømið í landi okkara kundi verið betur býtt millum íbúgvar okkara, so má ásannast, at vit øll sammett við fátækastu lond heimsins, liva í ørandi yvirflóð.

Um vit so harumframt hugsa um undirgrundina, fiskigrunnar og onnur náttúruríkidømi, er neyvan nakar, ið ivast í, at vit eru eitt av heimsins ríkastu londum.

Harumframt eru vit longst framkomna land, tá talan er um t.d. know-how viðvíkjandi m.a. snellu og línu.

Tá her verður tosað um snellu og línu, so er tað tí, at hesin reiðskapur er einfaldur at læra frá sæt og fer væl við grunnunum. Tá hugsað verður um lítið á leið kommu londini, er valla skil í at tosa um nútímans idnaðarskip í fyrstu atløgu.

Heiminum tørvar protein. Vit vita um lond, har alnikið er av ríkidømi í sjógvi og undirgrund, men har fólkið ikki veit, hvussu tey skulu fáa fatur í hesum ríkidømi, og sum tí mugu lúta fyri svongd, trotasjúkum og analfabeti.

Innanfyri fiskiskap eru vit før fyri at veita menningarlondum hjálp til sjálvhjálp, har vit sjálvi luttaka og sostatt fáa trygd fyri, at fólkið fær hjálpina, sum hon er ætlað.

Av tí at nógv hevur verið frammi um stuldur, skeivar lummar og yvirumsiting, tá talan hevur verið um hjálp til 3. heimin, er eyðvitað, at vit sjálvi hava menningarhjálpina undir hond.

Høvuðssjónarmiðið má vera at læra fólkið sjálvt at vinna burturúr sínum egna náttúrurikidømi, og harvið gerast sjálvbjargin og før fyri at livbjarga sær.

Ein sjálvfylgja er tað, at slík hjálp ikki verður kroyst niður yvir nakað land ella fólk eins og hjálpin fer fram í landi, ið vit hava natúrligt politiskt samband við, eins og vit eiga at fyribyrgja ágang móti fólksins mentan og siðmenning.

Spurningurin um menningarhjálp til fátæka heimin man neyvan vera at meta sum partapolitiskur spurningur.

Undan seinasta løgtingsvali, kom áheitan frá umboðum fyri fólkakirkjuna til allar flokksformenn á tingi um at meðvirka í, at ávís peninganøgd var sett av á tiggjartógina á hvørjum ári til hetta endamál.

Tá menn undir valstríðnum komu inn á henda spurning, søgdu allir seg at vera positivar mótvegis hesum máli.

Uppskotið her snýr seg um at lata 0,1 pct. av bruttotjóðarinntøkuni til menningarhjálp. Hetta er ætlað sum ein byrjan. Sum er, letur Svøriki 0,9 og Danmark og Noreg 0,7 pct. av bruttotjóðarinntøkuni til slík endamál. 0,7 pct. av bruttotjóðarinntøkuni er tað tal, ið SÞ hevur mælt limalondum sínum at geva.

Mong góð sjónarmið kunnu nevnast sum orsøk til at taka lut í slíkum arbeiði.

Her skal bert nevnast, at verðin er vorðin lítil, og granni okkara er ikki longur bert føroyingurin, men eins væl einhvør heimsborgari í fjarskotnum landi.

1. viðgerð 18. november. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 19. apríl 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Karini Kjølbro, Jógvani Sundstein, Adolfi Hansen og Atla Dam tann 14. september 1981 og undir 1. viðgerð tann 18. november 1981 beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutа og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Jørgen Thomsen, Svend Åge Eliefsen og Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja lógaruppskotið við hesum broytingum:

1) Í staðin fyri núverandi § 1 verður sett:
«§ *1*. Løgtingið setir árliga 0,1% av bruttotjóðarinntøkuni í grunn til menningarhjálp.«
2) Í staðin fyri núverandi § 4 verður sett:
»§ *4*. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1983.«

1) I stedet for nuværende § 1 indsættes:
»§ *1*. Lagtinget afsætter årlig 0,1% af bruttonationalproduktet i fond til udviklingsbistand.«
2) I stedet for nuværende § 4 indsættes:
»§ *4*. Denne lov træder i kraft 1. april 1983.«

Samstundis verður viðmerkt, at prosentparturin er av bruttotjóðarinntøkuni árið fyri.

Minnilutin (Hilmar Kass og Flemming Mikkelsen) tók ikki undir við lógaruppskotinum og hevði hesar viðmerkingar:

Undanfarin ár hava føroyingar, samanborið við fólkatalið, latið stóra hjálp til illa fyrikomin fólk. So gott sum øll hendа hjálp hevur verið sjálvboðin.

Í hesum uppskoti verður mælt til, at tað almenna skal lata menningarhjálp, sum ikki er heilt tað sama sum hjálp, ið latin verður, tá náttúruvanlukkur ella -nóðar umstøður hótta lívsmøguleikarnar hjá borgarunum, men hesar hjálpir liggja tó hvørjari aðrari nær, tí í nógvum førum er tað somu fólk, sum hava hesa hjálpina neyðini.

Tað er ein roynd lutur, at tá tað almenna tekur eina ábyrgd á seg, so verður tað, ið einstaklingurin ger, minni.

Tað hevði verið eitt stórt menniskjaligt aftursteg, um so varð í hesum hjálparbarbeiði. Tað, ið føroyingar kunnu lata í menningarhjálp, er ógvuliga munarlítið, serliga tá hugsað verður um, at stórur partur av slíkari hjálp als ikki kemur í røttu hendurnar.

Í samarbeiði við menningarlond kunnu vit við okkara sakkunnleika innan fiskivinnu vera teimum til munandi hjálp, samstundis sum vit økja um vinnumøguleikar okkara.

Slíkum arbeiði stuðlar sami minniluti, men teknr ikki undir við hesum lógaruppskoti.

Ein annar minniluti (Petur Reinert) kann ikki taka undir við fyriliggjandi uppskoti og førir fram:

Í viðmerkingunum til uppskotið verður greitt frá, at vit samanborið við onnur lond »liva í ørandi yvirflóð«.

Samstundis sum fleiri av uppskotsstillarunum halda tað vera í lagi at vaksa um tær byrðar, sum vit hvørt ár leggja á danskar verkamenn, sum peningatiga ofta eru nógv verri fyri enn vit sjálvir.

So leingi hitt føroyska samfelagið heldur hesa mannagongd vera beina -- kann eg ikki taka undir við, at partur av hesum peningi verður latin til aðrar sum menningarhjálp.

Hetta má haldast at vera óforsvarligt fyri ikki at siga ómoralskt.

2. viðgerð 22. apríl. Uppskotið frá meiriluta í nevndini til § 1 fall við 15 ja-atkvøðum, 16 atkvøddu ikki, 1 var burturstaddur. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen.

Burturstaddur: Sverre Midjord.

§ 1 í upprunauppskotinum fall við 15-0 atkvøðum.

36. Partapeningur í P/f Snarfrost, Miðvágur

Ár 1981, týsdagin 10. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um partapening í P/f Snarfrost, Miðvágur.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om aktier i P/f Snarfrost, Miðvágur.

§ *1.* Í § 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 2. september 1966 verður upphæddin »150.000 kr.« broytt til »640.000 kr.«.

§ *1.* I § 1 i lagtingslov nr. 59 af 2. september 1966 ændres beløbet »150.000 kr.« til »640.000 kr.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/f Snarfrost hevur tey seinastu 3 árini 1978, 1979 og 1980 útbygt flakavirkið munandi, og eru iløgurnar hesi 3 árini í bygningar og maskinur góðar 9,5 mió. kr.

Virkið er nú virðismett til 16 mió. kr.

Mett verður, at virkið nú á rationellan hátt er fært fyri at taka ímóti einum 5 - 6.000 tonsum.

Seinastu árini hevur virkið tikið ímóti 5.100, 4.900 og 4.125 tonsum av fiski um árið, og við teimum skipum, ið nú eru knýtt at virkinum, metir felagið, at nøgdin skuldi kunnað ligið um 5.500 tons árliga frameftir.

Árliga lønarútgjalding til arbeiðsfólkið í Miðvági/Vatnsoyrum og Sandavági hevur verið miltum 5 og 6 mió. kr.

Nukað av iløgunum hesi árini er liggjað yvir raksturin, og hevur felagið tí samtykt at hækka partapeningin úr 820.000 kr. upp til 3,2 mió. kr., og søkir felagið landsstýrið um, at landskassin hækkar sín part av partapeninginum úr 150.000 kr. til 640.000 kr.

Sambært løgtingslóg nr. 59 frá 2. september 1966, løgtingsmál nr. 7/1966, fekk landsstýrið heimild til at tekna upp til 150.000 kr. í felagið.

Skotið verður upp, at landskassin hækkar sín part av partapeninginum til 640.000 kr.

1. viðgerð 16. november. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 25. november legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 10. november 1981 og undir 1. viðgerð tann 16. november beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið mælir til, at landskassin hækkar sín part av partapeninginum í p/f Snarfrost úr kr. 150.000,00 til kr. 640.000,00.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Aunfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Asbjørn Joensen og Adolf V. Hansen) er av teirri áskoðan, at partapeningurin ikki skal hækkast til kr. 640.000,00, men til kr. 626.000,00 og kemur talið fram á tann háttin, at 20% av ti samlaðu hækkingini í partapeninginum hjá p/f Snarfrost úr kr. 820.000,00 upp til kr. 3.200.000,00 er kr. 476.000,00. Saman við áður heimilaðu kr. 150.000,00 verður talið hereftir kr. 626.000,00 og setir meirilutin fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1 verður »640.000 kr.« broytt til »626.000 kr.«.	I § 1 ændres »640.000 kr.« til »626.000 kr.«.

Minnilutin (Atli P. Dam og Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins um, at upphæddin verður upp á kr. 640.000,00.

2. viðgerð 1. december. Broyting í § 1 frá meiriluta í nevndini samtykt við 17-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 31-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð 31-0.

3. viðgerð 9. december. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-0.

F.L.j.nr. 1413-1-54 Lóg nr. 5 frá 21. januar 1982.

37. Partapeningur í P/f Nykur, Toftir

Ár 1981, týsdagin 10. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um partapening í P/f Nykur, Toftir.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om aktier i P/f Nykur, Toftir.

§ 1. Í § 1 í løgtingslóg nr. 39 frá 1. juni 1979 verður upphæddin »kr. 300.000« broytt til »kr. 500.000«.

§ 1. I § 1 i lagtingslov nr. 39 af 1. juni 1979 ændres beløbet »kr. 300.000« til »kr. 500.000«.

§ 2. Hendan lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrinum var við lóg nr. 39 frá 1. juni 1979, løgtingsmál nr. 44/1978 (vetrarting), landskassans vegna heimilað at tekna partapening fyri upp til kr. 300.000 í P/f Nyki, Toftir. Hetta var 20% av hækkanini í partapeninginum úr kr. 500.000 uppí kr. 2 mió.

Útbyggingin var tá mett at kosta kr. 12,9 mió., men kom útbyggingin tilsamans at kosta 18,5 mió. kr.

Fíggingin av útbyggingini verður:

Direktoratet for Egnsudvikling (lán)	3.215.000 kr.
Direktoratet for Egnsudvikling (tilskot)	1.935.000 kr.
Maskinuleverandørar	2.076.000 kr.
Fiskaríbankin, iroknað kurstapslán	7.715.000 kr.
Bankalán	1.535.000 kr.
Tilsamans	16.476.000 kr.

Partapeningurin, sum upprunaliga var 500.000 kr., og sum varð hækkaður við 1,5 mió. kr., skal nú hækkast við 1 mió. kr. aftrat, og søkir felagið um, at landskassin setir 20% av hækkingini ella 200.000 kr. aftrat sum partapening í felagið.

Skotið verður upp, at landskassin hækkar sin part av partapeninginum við 200.000 kr.

1. viðgerð 16. november. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 11. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 10. november 1981 og undir 1. viðgerð tann 16. november beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið mælir til, at landskassin nú setir kr. 200.000,00 í aftursat sum partapening í p/f Nykur.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Adolf V. Hansen, Annfinn Kallsberg, Ove Mikkelsen, Øssur Dam Jacobsen, Atli Dam) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Annfinn Kallsberg viðmerkir, at hann tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men er varugur við, at tað er ein tendensur til, at kapaciteturin á flakavirkjunum er so nógv útbygdur, at tey nøkta tørvin til ta rávøru, vit hava møguleikar fyri at fáa í komandi árum. Spurningurin er tí, um ikki rættari er í framtíðini at leggja meira á tann bógv at foredla framleiðsluna, ið flakavirkini útvinna í dag.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) vísir á, at vit til nú hava eina flakaorku um 180.000 tons, meðan tann nøgd vit viðgera er um 80.000 til 100.000 tons.

Tað má vera greitt, at ein framhaldandi íløga kemur at seta framhaldandi størri krøv til landskassan, tí virkini ongan møguleika hava fyri rímiligum rakstrarúrslitum.

Um ein skuldi havt tað fyri eygað, at virkini seinri kunnu tillagast til virkan av øðrum fiskavørum enn teim vanligu — krevur hetta aftur stóríløgur.

Sjálvstýrisflokkurin mælir tí til eina miðvísari um- ella útbygging, og at hetta verður lagt fyri tingið áður enn byrjað verður, um hetta krevur almennan partapening.

Út frá hesum verður einki uppskot sett fram.

2. viðgerð 15. december. § 1 samtykt við 31-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 16. december. Uppskotið varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1413-1-58 Lóg nr. 4 frá 21. januar 1982.

38. Landsstýrismál

Ár 1982, mikudagin 19. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur sent løgtinginum útskriftir úr gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 31. juli 1980 til 24. juli 1981.

Málið varð beint í landsstýrismálanevndina.

Útskriftirnar úr gerðabók landsstýrisins í hesum tíðarskeiði eru frá tveimum landsstýrum.

Undanfarna landsstýrið hevði 28 fundir í tíðarskeiðinum 31. juli 1980 til 5. januar 1981.

Núverandi landsstýrið hevði 42 fundir í tíðarskeiðinum 5. januar 1981 til 24. juli 1981. Tilsamans hava 70 fundir verið.

Eftir at hava kannað útskriftirnar, setir ein meiriluti í nevndini (Edmund í Garði og Flemming Mikkelsen) fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir tær avgerðir, sum landsstýrini hava tikið sambært útskriftir úr gerðabókini fyri tíðarskeiðið 31. juli 1980 til 24. juli 1981.

Ein minniluti í nevndini (Finnbogi Isaksen) ger hesar viðmerkingar:

Gerðabókin fevnir um eitt tíðarskeið, tá tvey landsstýri hava sitið. Í gerðabókini sæst, at gamla landsstýrið samtykti á fundi 28. august 1980 at heita á Vilhelm Johannesen og Heðin Klein um at tilevna uppskot at leggja fyri landsstýrið um menningarhjálp til Guinnea Bissau. Síðani sást einki aftur til málið. Á sama fundi varð samtykt, at Vaktar- og Bjargingartænastan skuldi fáa heimild at siga við føroysk skip, sum fingu boð frá íslendingum um at fara av tí fiskimarkszonunni millum londini, at Vaktar- og Bjargingartænastan kundi ikki vera teimum til hjálpar, um tey vórðu tikin. Tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, um nakað meira er bent í hesum máli.

11. september 1980 hevði landsstýrið so tann vanlukku fund, sum seinni førdi til samgonguslit. Á hesum fundi varð samtykt við 4 atkvøðum at góðkenna vertrarferðaætlanina hjá »Smyril«.

Á fundi 9. oktober 1980 løgdu landsstýrismenninir Heðin Klein og Hergeir Nielsen fram uppskot til samtyktar um, at landsstýrið skuldi mótmæla Nato-

útbygging í Føroyum og at hernaðarligar venjingar fara fram á føroyskum sjóøki. Løgmaður tók ikki undir við hesum mótmæli við ávísum grundgevingum. Eitt sæst til støðutakanina hjá hinum landsstýrismonnunum, men tað trúligasta er helst, at uppskotið ikki varð samtykt.

Tað sæst í gerðabókini, at spurningurin um sølu av »Nónhamri« var eisini fyri í tí fyrra landsstýrinum. Á fundi 11. december 1980 varð lagt fram eitt tilboð frá føroyingum í Grønlandi o.fl. um, at teir vildu keypa trolaran fyri 26,5 mió. kr. Landsstýrið svaraði, at støða var ikki enn tikin til sølu.

Á fundi 12. december varð samtykt at játta 3 mió. kr. at seta nýggja skrúvudysu og reduktiónsgear í trolaran. Tað strið, sum síðani hevur verið um at selja trolaran, hevur verið aftaná tað tíðarskeið, sum henda gerðabók umfatar.

22. desember 1980 samtykti landsstýrið at fyrireika yvirtøku av realkreditstovninum. Hetta átti tó ikki at kravt so nógvar fyrireikingar, ti landsstýrið hevði fleiri ár frammanundan fingið skrivliga tilsøgn frá forsætisráðnum um loyvi at yvirtaka stovnin. Hetta kundi gerast bert við at samtykkja eina løgtingslóg um rakstur og fyrisiting av stovninum.

Fyrra landsstýrið helt sín seinasta fund 5. januar 1981, og tann seinasta samtyktin, sum tað landsstýrið gjørdi, var at seta eina javnstøðunevnd.

6. januar 1981 hevði tað nýggja landsstýrið sín fyrsta fund. Tað hevur verið siður, at eitt og hvørt nýtt landsstýri skrivliga váttaði, at tað vildi halda heimastýrislógina, stýrisskipanarlógina, lóg um umboðsvald Føroya og landsins lógir annars. Men í hesari gerðabók sæst eitki til, at hetta sambandsstýri hevur gjørt slikan trygdareið. Tað nýggja stýrið tók við sum eitt sparingarstýri, men longu á sínum fyrsta fundi samtykti tað at senda eina umboðsnevnd, 6 mans í tali, bæði til Íslands, Noregs og Brüssel. Á sínum næsta fundi viðgjørdi landsstýrið spurningin um, at landsstýrismenn skulu leggja onnur størv frá sær. Minnilutin er sum heild nøgdur við avgerð landsstýrisins, m.a. avgerðina um at Torbjørn Poulsen fer úr blaðstjórnini fyri blaðið »Tingakrossur«. Samstundis loyvir minnilutin sær tó at gera vart við, at hann heldur tað vera eina óhepna samanblanding av almennum og privatum áhugamálum, tá Olaf Olsen samstundis er landsstýrismaður og nevndarlimur í Føroya Banka.

Á sínum triðja fundi umrøddi landsstýrið likviditetsstøðuna hjá landskassanum og samtykti at kanna lánmøguleikarnar og at innheinta lántilboð. Á hesum sama fundi, sum var 15. januar 1981, viðgjørdi landsstýrið umsókn frá Føroya Eggvirki um veðhald fyri láni til ymsar útbyggingar. Samtykt varð at veita veðhald upp til 200.000 kr. við ymiskum treytum.

Á fundi 26. februar samtykti landsstýrið at søkja um rentustudning til íløgulán hjá Føroya Eggvirki og veðhalda fyri upp til 600.000 - 700.000 kr. í láni. Tað er ikki greitt hvar landsstýrið hevur søkt um slikan rentustudning. Á fundi 17. mars samtykti landsstýrið at veðhalda fyri 700.000 kr. í láni til Føroya Eggvirki. At enda verður á fundi 3. apríl ásannað, at av misgáum er veðhaldið á fundinum frammanundan avmarkað til 700.000 kr. Rætta talið er 900.000 kr. tilsamans.

Landsstýrið viðgjørdi á fundi 17. mars 1981 spurningin um at keypa EDV-tól til

gjaldstovuna. Løgmaður førdi fram, at ætlaða EDV-projektið var skeivt, og mótmælti keypinum, og Eilif Samuelsen tók undir við honum. Á næsta fundi samtykti landsstýrið, at EDV-tól skuldi ikki keypast til skattadeildina. Likt er til, at landsstýrið longu tá hevur avgjørt at leggja allar skattainnkrevjingar undir eina privata fyritøku.

Landsstýrið samtykti á fundi 26. mars, at eingin løgmansveitsla skuldi verða. Men at landsstýrið í staðin skuldi lata feløgum teirra brekaðu 40.000 kr. í studningi. Alt bendir á, at um løgmaður hevði hildið veitslu, so hevði landsstýrið ongan pening latið í samband við ár teirra brekuðu.

Longu um miðjan apríl í fjør samtykti landsstýrið, nær løgmaður og landsstýrismenninir skuldu hava summarfrí, men mongum brestir ætlan. Tað framgongur av gerðabókini, at tað hevur gingist ógvuliga striltið at halda hesa megnaætlan.

5. juni 1981 viðgjørdi landsstýrið skriv frá Kreditforeningen Danmark um lánveiting til sethúsabygging í Føroyum. Landsstýrið samtykti at samráðast við peninga stovnarnar um málið, men síðani sæst einki aftur til tað.

Landsstýrið heldur, at skattavaldið praktiserar reglurna um skattlegging av tilflytarum órímiliga. Samtykt varð tí á fundi 19. juni 1981 at biðja Líkningarráðið um eitt tilmæli, men tað er ikki greitt um skattingin nú er vorðin harðari.

Minnilutin hevur her bert víst á nøkur av teimum málum, sum fyrra landsstýrið og tað nú sitandi hava viðgjørt. Tað er áskoðan minnilutans, at núverandi landsstýri hevur ikki tak á viðurskiftunum, avgerðirnar eru skiftandi, og eingin bein kós sæst at vera í støðutakanini. Sjálvt um í gerðabókini sæst skilliga at landsstýrið mangan ber seg fjákut og býttisliga at. Heldur hetta skilið fram, verður tað tógvið strið hjá einum komandi landsstýri at rudda upp og fáa lagt eina miðvísa og átrokandi útbyggingarætlan, bæði á tí almenna og tí privata økinum. Tað rímiligasta hevði verið, at landsstýrið sjálvt ásannaði sítt dugnaloysi og legði frá sær.

2. viðgerð 21. apríl. Atkvøðugreiðsla 22. apríl. Málið varð samtykt við 22 -0 atkvøðum.

F.t.,j.nr. 204-2.

39. Partapeningur í P/f Kovanum, Sandavági.

Á 1981, týsdagin 10. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um partapening í P/f Kovan, Sandavági.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om aktier i P/f Kovin, Sandavágur.

§ *1.* Í § 1 í løgtingslóg nr. 67 frá 18. oktober 1978 verður upphæddin »kr. 300.000« broytt til »kr. 400.000«.

§ *1.* I § 1 i lagtingslov nr. 67 af 18. oktober 1978 ændres beløbet »kr. 300.000« til »kr. 400.000«.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrinum varð við lóg nr. 67 frá 18. oktober 1978 landskassans vegna heimilað at tekna partapening fyri upp til kr. 300.000,- í P/f Kovanum, Sandavági. Um viðmerkingar til lógaruppskotið sí løgtingsmál nr. 48/1978.

Felagið Kovin er nú komið so mikið ávegis við virkinum, at húsið skal standa liðugt til heystar, og hevur felagið á aðalfundi samtykt at hækka partapeningin úr 1,5 milj. kr. til 2 milj. kr.

Søkt verður um, at landskassin hækkar sín part úr kr. 300.000 til 20% av 2 milj. kr. til 400.000 kr.

Figgingin verður sostatt:

Játtað úr Egnsudviklingsfonden	studningur	kr. 1.045.000
Játtað úr Egnsudviklingsfonden	lán	kr. 2.000.000
Játtað úr Ídnaðargrunninum	lán	kr. 1.625.000
Játtað úr Menningargrunninum	lán	kr. 750.000
Játtað úr Menningargrunninum	studningur	kr. 250.000
Eginpeningur		kr. 2.000.000
		kr. 7.670.000

Skotið verður upp, at landskassin hækkar sín partapening við kr. 100.000 til kr. 400.000,-.

1. viðgerð 16. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 25. november legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. november 1981 og undir 1. viðgerð 16. november beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið søkir um, at landskassin fær løgtingsins loyvi til at hækka sín part av partapeninginum í P/f Kovanum, Sandavágur úr kr. 300.000,00 til kr. 400.000,00. P/f Kovin hevur á aðalfundi samtykt at hækka partapeningin úr 1,5 milj. kr. til 2 milj. kr.

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 1. december. § 1 samtykt við 29-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð við 31-0.

3. viðgerð 9. december. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1427-1-167 Lóg nr. 3 frá 21. januar 1982.

---

40. Søla av gomlu telegrafstøðini.

Ár 1981, týsdagin 10. november legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um sølu av gomlu telegrafstøðini.	*lagtingslov om salg af den gamle telegrafstation.*
§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at	§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at

selja ogn Postverk Føroya matr. nr. 737a, Tórshavnar býur.	sælge Postverk Føroya's ejendom matr. nr. 737a af Torshavn by.
§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Ein fylgjan av at postverkið frá apríl 1976 varð yvirtikið sum føroyskt sermál var, at »Generaldirektoratet for Post- og Telegrafvæsenet« handaði landsstýrinum bygningar, byggilendi og tilfar, ið varð nýtt ella ætlað nýtt í Føroyum av postverkinum. Millum hesar ognir var matr. nr. 737a, Tórshavnar býur ella gamla telegrafstøðin við Tingshúsvegin. Skeytið til Postverk Føroya er skrivað 2. mai 1979, yvirtøkan fór tó fram longu 1. apríl 1976. Avhendingin var ókeypis.

Grundstykkið er 1273 m² og í 1979 virðismett til 200.000 kr., meðan húsini á stykkinum vórðu mett til 800.000 kr.

Tórshavnar býráð hevur vent sær til landsstýrið um at fáa ognina til keyps. Samstundis váttar býráðið, at tað kann útvega postverkinum onnur høli til tað, sum postverkið í dag nýtir ognina til, t.v.s. sum fyribils goymsluhøli.

Eftir at samráðst er við poststjóran, er landsstýrið fyri sin part sinnað fyri at selja ognina.

1. viðgerð 13. november. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 15. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 10. november 1981 og undir 1. viðgerð tann 13. november beint í fíggjarnevndina. Landsstýrið biður um heimild at selja ogn Postverk Føroya Løgtings nr. 737a, Tórshavnar býur, gamla telegrafstøðin.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í 5 minnilutar.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Øssur Dam Jacobsen og Annfinn Kallsberg) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein annar minniluti (Asbjørn Joensen) tekur undir við, at ognin verður latin Tórshavnar býráð. Tað er tó at gera vart við, at postverkið nýtir ognina og ikki er sinnað at avhenda hesa fyribils. Mælt verður til, at landsstýrið setir seg í samband við landsstovnin Postverk Føroya um avhendan av gomlu telegrafstøðini.

Ein triði minniluti (Atli P. Dam) tekur í prinsippinum undir við at veita landsstýrinum hesa heimild, um so er, at nevnda søla kann gerast partur í makaskifti, ið

kann vera liður í størri byggiætlan, ið loysir tørv hjá landsumsitingini, Tórshavnar býráð og aðrari bygging av hálvalmennum slagi.

Tað hevur ikki verið møguligt í fíggjarnevndini at fingið váttan fyri, at nýtilig loysn kann fáast viðvikjandi teim byggingum, ið liggjan aftanfyri hesa sølu.

Mælt verður til at áleggja landsstýrinum at seta slíkar treytir í sambandi við møguliga sølu, at hendan søla gerst liður í eini størri ætlan.

Ein fjórði minniluti (Adolf V. Hansen) tekur ikki undir við málinum og mælir frá at selja gomlu telegrafstøðina, áðrenn postverkið hevur fingið byggiloyvi til ætlaðan nýggjan bygning, við tað at postverkið nýtir telegrafstøðina í dag og ikki tolir uppsøgn frá eigara síðu.

Hin fimti minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur ikki undir við málinum og mælir frá, at gamla telegrafstøðin verður seld, tá postverkið nýtir hana í dag, og tørvur er á almennum bygningum í Tórshavn.

2. viðgerð 16. december. Skotið varð upp, at málið skuldi aftur í nevnd. At málið ikki skuldi aftur í nevnd varð samtykt við 18-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins § 1 varð samtykt við 19-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

Sama dag løgdu tingmenninir Vilhelm Johannesen, Ove Mikkelsen, Juul Jacobsen og Asbjørn Joensen fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Sum 2. stk. í § 1 verður sett:

»Sølan av gomlu telegrafstøðini verður at effektuera, tá sølan er liður í eini størri ætlan, sum eisini loysir tørv Postverks Føroya.«

3. viðgerð 16. december. Broytingaruppskot til § 1 fall við 12-0 atkvøðum. Uppskotið solciðis sum samtykt við 2. viðgerð samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2442-1 Lóg nr. 6 frá 21. januar 1982.

41. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann.

Ár 1981, mánadagin 23. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Peturi Reinert, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Í vártingsetuni gjørdi løgtingið hesa samtykt:

»Meginreglan í fiskivinnupolitikkinum verður tann, at vit røkta og nýta fiskirikidømi landgrunsins á slíkan hátt, at hetta ríkidømi verður varðveitt og umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum,
at royndirnar vera ikki størri enn fiskastovnarnir tola,
at teir fiskastovnar, ið nú eru ovveiddir, verða upp aftur bygdir,
at stødd og samansetting veiðiflotans verður lagað eftir hesum møguleikum.«

Hvørji tiltøk hevur landsstýrið higar til framt til tess at seta hesa meginreglu í verk og hvørji tiltøk ætlar landsstýrið í framtíðini at seta í verk hesum viðvíkjandi?

25. november varð við 19-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. december svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður fyrispurninginum frá Peturi Reinert, løgtingsmanni soleiðis

SVAR

uppá fyrispurning um:

Hvørji tiltøk hevur landsstýrið higartil framt til tess

1) at vit røkta og nýta fiskirikidømi landgrunsins á slíkan hátt, at hetta ríkidømi verður varðveitt og umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum,
2) at royndirnar vera ikki størri enn fiskastovnarnir tola,
3) at teir fiskastovnar, ið nú eru ovveiddir verða upp aftur bygdir,
4) at stødd og samansetting veiðiflotans verða lagað eftir hesum møguleikum,

og hvørji tiltøk ætlar landsstýrið í framtíðini at seta í verk hesum viðvíkjandi?

Fyri at uppfylla tey krøv, sum vist verður til í framman fyristandandi fyrispurningi, hevur landsstýrið millum annað sett pening av á fíggjarlógini til:

1) Fiskirannsóknarstovuna, so hon kann hava »Magnus Heinason« í fiskiskapi og rannsóknum fyri at finna alternativar veiðimøguleikar, at hann kann fylgja við og

kanna, hvussu fiskastovnarnir eru fyri og tilikt, og fyri at okkara fiskifrøðingar og teirra hjálparar kunnu framhaldandi fylgja við, hvussu umstøðurnar eru við okkara ognum i sjónum, og hvussu tær kunnu røktast á besa hátt,

2) Ráfiskagrunnin, so tað skal vera møguligt hjá okkara sjónonnum og okkara veiðiførum at reka tann fiskiskap, sum vit eru so butidnir at, og at grunnurin kann nýta peningin á skilabesta hátt, so veiðan eisini kann verða beind móti teimum fiskasløgum, sum tola tað best,
3) Lønjavningargrunnin, so hann á annan hátt enn Ráfiskagrunnurin kann halda fiskivinnuni gangandi,
4) Fiskiskap á fremmandum høvum,
5) Eisini eru játtað 20 oyru fyri kg eyka til veiðu eftir svartkjafti bæði til manna og til iðnað fyri at eggja monnum til hesa veiði,
6) Verksmiðjutrolarin »Giljanes« hevur fingið stóri veðhald, fyri at svartkjafta veiðan ikki skal detta niðurfyri.
7) Okkara fiskifrøðingar hava fingið álagt ta uppgávu, at eitt TAC kemur á svartkjaftin, og hesum eru teir i gongd við, eins væl og ICES hevur fingið officiella áheitan frá okkum um at áseta eitt slíkt TAC.
8) Samráðst hevur verið við onnur lond um veiðumøguleikar.
9) Virkað hevur verið fyri, at avtala kundi fáast við grønlendingar um veiðu av t.d. lodnu.
10) Innflutningsloyvi hevur higartil í ár ikki verið givið til skip at veiða teir harðast fiskaðu stovnarnir.
11) Fiskivinnuráðið er biðið um eitt tilmæli, um hvussu — sum ráðið skjýtur upp — fiskiflotin skal tillagast teimum broyttu viðurskiftunum.
12) Fiskivinnuráðið er eisini biðið um tilráðingar viðvikjandi møguligum broytingum i uppbýtinum av landleiðini millum ymsar veiðihættir.

Av ti, sum landsstýrið ætlar at seta i verk, kann nevnast:

1) Heimild til Fiskirannsóknarstovuna at steðga veiðu á ávisum økjum i upp til 7 dagar, um teir meta, at ov stórur partur av veiðuni er ungfiskur.
2) At steðga veiðu eftir botnfiski nakrar dagar av árinum.
3) At avmarka veiðuna av toski og hýsu hjá teimum størru trolarunum (yvir 700 hk) og partrolarunum, soleiðis at hon er hægst 25% av samlaðu ársveiðuni hjá hvørjum trolara sær.
4) At játta meiri pening á næstu fíggjarlóg til Fiskirannsóknarstovuna til at nýta til praktiskar fiskiroyndir o.a., fyri at koma i gongd i størri mun við høgguslokkaveiðu, at menna svartkjaftaveiðuna meir, at kanna makrelin betri o.a.m.
5) At viðgera tilmælini, sum koma frá Fiskivinnuráðnum.

F.L.j.nr. 1500-1-7-3

42. Fyrispurningur til løgmann.

Ár 1981, týsdagin 10. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Erlendi Patursson, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

Hvussu leingi ætlar landsstýrið at sýta postverkinum loyvi til neyðugar hækkingar í postgjøldunum?

11. november varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

11. december svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Harra Erlendur Patursson, løgtingsmaður, hevur 10. november 1981 sett mær soljóðandi fyrispurning:

»Hvussu leingi ætlar landsstýrið at sýta postverkinum loyvi til neyðugar hækkingar í postgjøldunum?«

Til hetta er at siga:

Sitandi landsstýri hevur í fleiri førum noktað almennum stovnum at hækka gjøld fyri almennar tænastur.

Orsøkirnar eru fleiri. M.a. ynskir landsstýrið at útvega borgarunum so bíligar tænastur sum gjørligt. Eisini heldur landsstýrið tað vera rætt at gera stovnsleiðslunum heilt greitt, at tað er neyðugt at visa varsemi, tá talan er um útreiðslur til rakstur og íløgur.

Landsstýrið og ein samd fíggjarnevnd sýttu postverkinum at hækka postgjøldini á heysti 1981.

Postverk Føroya roknar við at hava eitt roknskaparhall í fíggjarárinum 1981/82 uppá út við 6 milj. kr., og um gjøldini ikki verða hækkað, eitt hall uppá umleið 13 milj. kr. í fíggjarárinum 1982/83.

Landsstýrið fer í næstum at viðgera spurningin um postgjøld, og væntandi verður loyvt postverkinum eina minni hækkan av postgjøldunum frá 1. apríl 1982.

43. Fyrispurningur til løgmans.

Ár 1981, týsdagin 10. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Erlendi Patursson, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

Hvussu leingi ætlar landsstýrið at sýta útvarpinum loyvi til neyðugar hækkingar í útvarpsgjaldinum?

11. november varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

11. december svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Harra Erlendur Patursson, løgtingsmaður, hevur 10. november 1981 sett mær soljóðandi spurning:

»Hvussu leingi ætlar landsstýrið at sýta útvarpinum loyvi til neyðugar hækkingar í útvarpsgjaldinum?«

Til hetta er at siga:

Sitandi landsstýri hevur í fleiri førum noktað almennum stovnum at hækka gjøld fyri almennar tænastur.

Orsøkirnar eru fleiri. M.a. yvirskir landsstýrið at útvega borgarunum so bíligar tænastur sum gjørligt. Eisini heldur landsstýrið tað vera neyðugt at gera stovnsleiðslunum greitt, at tað er neyðugt at vísa varsemi, tá talan er um útreiðslur til rakstur og íløgur.

Í sambandi við uppsetan av uppskoti til løgtingsfiggjarlóg fyri 1982/83 fer landsstýrið at kanna spurningin um útvarpsgjøld. Eg meti tað vera ivasamt, um loyvi verður givið til Útvarp Føroya at hækka útvarpsgjaldið fyri fíggjarárið 1982/83.

44. Fyrispurningur til løgmans.

Ár 1981, týsdagin 10. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Erlendi Patursson, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

Hin 17. apríl 1975 gjørdi løgtingið soljóðandi samtykt:

»Føroya løgting samtykkir, at málsøkið »Undirgrund Føroya og havbotnurin« verður yvirtikið sum føroyskt sermál«.

Ætlar landsstýrið í komandi samráðingum við donsku ríkismyndugleikarnar um hetta mál at halda fast um hesa samtykt løgtingsins?

11. november varð við 25 0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

11. december svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Harra Erlendur Patursson, løgtingsmaður, hevur 10. november 1981 sett mær soljóðandi fyrispurning:

»Hin 17. apríl 1975 gjørdi løgtingið soljóðandi samtykt:

»Føroya Løgting samtykkir, at málsøkið »undirgrund Føroya og havbotnurin« verður yvirtikið sum føroyskt sermál«.

Ætlar landsstýrið í komandi samráðingum við donsku ríkismyndugleikarnar um hetta mál at halda fast um hesa samtykt løgtingsins?«

Til hetta er at siga:

Í ti samgonguskjali, sum sjálvstýrisflokkurin, fólkaflokkurin og sambandsflokkurin samdust um við ársbyrjan, er hesi spurningur týðiliga umrøddur.

Samgonguskjalið, sum er lagt alment fram, sigur: »Samráðingar verða førdar við donsku stjórnina um at gera undirgrund Føroya og havbotnin til føroyskt sermál. Í samráðingunum verður dentur lagdur á at tryggja, at einki verður at henda viðvíkjandi rannsóknum í og útvinningini úr undirgrundini og havbotninum uttan loyvi frá heimastýrinum.«

Hesar samráðingar skuldu byrja 2. december í ár, men eru fyribils útsettar, orsakað av at fólkatingsval er útskrivað.

Tað er mín metan, at hendan orðingin er nóg greitt svar uppá setta spurningin.

F.L.j.nr. 1201-6

45. Laksaveiðan á føroysku landleiðini

Ár 1981, týsdagin 10. november legði Petur Reinert, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Føroya Løgting samtykkir at taka spurningin um laksaveiðuna á føroysku landleiðini til viðgerðar.

1. viðgerð 16. november. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 19. januar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 10. november 1981 og undir 1. viðgerð 16. november beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Edmund í Garði, Jógvan Sundstein, Jógvan Olsen og Hilmar Kass) førir fram:

Undir 1. viðgerð var spurningurin um laksaveiðuna á føroysku landleiðini viðgjørdur.

Málið hevur sostatt fingið ta viðgerð, sum biðið verður um og má roknast at vera avgreitt.

Meirilutin setir einki uppskot fram.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Jørgen Thomsen) tekur eisini støðu í tingsalinum.

25. januar legði minnilutin í marknaðarnevndini (Petur Reinert og Erlendur Patursson) fram soljóðandi

MINNILUTAÁLIT

UPPSKOT
til
samtyktar

Samtíðis sum løgtingið vísir frá sær øllum ætlanum um einsíðugt at avmarka laxaveiðini okkara á føroysku landleiðini bilateralum avtalum boðar løgtingið frá, at tað er siunað til at vera við til at fáa í lag millumlandaskipan millum øll avvarðandi laxaveiðilond, har øll átaka sær somu skyldur viðvíkjandi varðveiting av laxastovninum.

2. viðgerð 25. januar. Minnilutaálitið fall við 13 jaatkvøðum, 17 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu:

Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki:

Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein.

Burturstaddir:

Hilmar Bech og Atli Dam.

46. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1981 og 1982

Ár 1981, fríggjadagin 13. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktirnar á NAFO-fundunum í 1981 um regulering av fiskiskapinum í konventiónsøkinum í 1981/1982

Viðmerkingar:

Á 3. eykaaðalfundi í NAFO, hildin í Montreal 25. og 26. juni 1981 var eftir føroyskum og kanadiskum uppskoti TAC viðvíðkjandi toski á økinum 3M, Flemish Cap, endaliga sett til 12.405 tons. Kvotan til Føroya varð samtykt til 2.900 tons fyri 1981.

Á 3. regluliga ársfundi í NAFO, hildin í Halifax, Nova Scotia, 8. - 11. september 1981 var eingin tilráðing frá vísindaligu ráðnum innan NAFO um annað TAC enn áðurnevndu 12.405 tons. Kvotan til Føroyar var óbroytt samtykt til 2.900 tons í 1982 á NAFO-økinum 3M Flemish Cap (skjal 1 og skjal 2).

Harumframt fiska føroyingar eisini árliga nakað av toski á økinum 3 NO. Eingin kvota verður her serstakliga tillutað føroyingum, men hava vit seinastu árini fiskað av hesi kvotu tillutað øðrum (»others«). Kvotan í sini heild var bæði fyri 1981 og 1982 sett til 700 tons.

Table 1. Total allowable catches and quotas (metric tons) for 1982 of particular species in Subareas 3 and 4 of the NAFO Convention Area.
(The values listed include quantities to be taken both inside and outside the 200-mile fisheries zone, where applicable.)

CONTRACTING PARTY	COD		REDFISH		AMERICAN PLAICE		YELLOWTAIL	WITCH	CAPELIN	SQUID (Illex)
	3M	3NO	3M	3LN	3M	3LNO	3LNO	3NO	3NO	3+4
Bulgaria	-	-	300	-	-	-	-	-	-	500
Canada	100	5,800	5,500	10,000	250	54,250	12,470	3,000	30,000[3]	-[4]
Cuba	480	850	1,550	2,250	-	-	-	-	-	3,150
European Economic Community	2,405	210	1,200	-	-	700	430	-	-	-[4]
Faroe Islands (Denmark)	2,900		-	-	-	-	-	-	-	-
German Democratic Republic	-		-	850	-	-	-	-	-	-
Iceland	-		-	-	-	-	-	-	-	-
Japan	-		400	-	-	-	-	-	-	2,250
Norway	1,200		-	-	-	-	-	-	-	-
Poland	500		-	-	-	-	-	-	-	2,000
Portugal	3,500	1,100	600	350	250	-	-	-	-	500
Romania	-		-	-	-	-	-	-	-	500
Union of Soviet Socialist Republics	1,270	4,340	10,350	10,000	1,000	-	-	1,950	-	5,000
Others	50	700	100	150	500	100	100	50	-	-
TOTAL	12,495[1]	17,000[2]	20,000	25,000	2,000	55,000	13,000	5,000	30,000	150,000[4,5]

[1] The TAC will not be increased beyond 12,405 M.T. until the Scientific Council advises that the age 3+ mean biomass has reached a level approximately equal to one-half the mean age 3+ equilibrium biomass associated with fishing at P_{max}, and assuming long term average recruitment levels.

[2] TAC shall not be increased until such time as the Scientific Council reports that age 3+ annual mean biomass has reached 200,000 metric tons.


[3] Reserved for Canadian fishing in 3L.

[4] Any quota listed for squid may be increased by a transfer from any "coastal state" as defined in Article 1, para. 3 of the NAFO Convention, provided that the TAC for squid is not exceeded. Transfers made to Contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the report shall be made as promptly as possible.

[5] The opening date for the squid (Illex) fishery is 1 July 1982.

[6] The dashes which appear in the place of allocations to Canada and the EEC do not signify zero allocations. Allocations to these Contracting Parties, as yet undetermined, shall not exceed the difference between the total of allocations to other Contracting Parties and the TAC.

grense ved Canadas økskyst



1. viðgerð 18. november. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 19. januar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 13. november 1981 og undir 1. viðgerð 18. november 1981 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 11. januar 1982 viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnt til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 25. januar. Atkvøðugreiðsla 26. januar. Uppskotið varð samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1519-20.

---

47. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann

Ár 1981, mikudagin 11. november boðaði formaðurin frá fyrispurninginum frá Adolf V. Hansen, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

1. Hevur ella fer landsstýrið at taka stig til at draga (fyri-)skiparan á I.R.F. (formannin í Interkommunala renovatiónsfelagsskapinum) inn fyri rættin við kravi um bót og at hald verður lagt á reiðskapin fyri at hava vegagerð í gongd á einum friðaðum øki norðan Høganes, á sama hátt sum landsstýrið gjøgnum stovn sín, Vaktartænastuna, kravdi og fekk skiparan á m.s. Sjúrðaklettí dømdan bót og

eigaran at missa reiðskapin fyri at hava havt arbeiði í gongd á einum friðaðum øki norðan Enniberg?

2. Hvi eru harðari revsireglur fyri teir ið fyriskipa arbeiði á sjógvi, enn fyri teir, ið fyriskipa arbeiði á landi, um brotsverk verður framt móti friðingarreglum landsstýrisins?

Viðmerkingar:

Mánadagin 9. november 1981 varð skiparin á Sjúrðarkletti av Føroya rætti dømdur stóra bót, og eigarin at missa reiðskapin, tí skipið hevði arbeitt á einum friðaðum øki.

Vaktartænastan hevur til uppgávu at ansa eftir at friðingarreglurnar á sjógvi verða yvirhildnar.

Natúrfriðingarnevndin hevur til uppgávu at ansa eftir, at friðingarreglurnar á landi verða yvirhildnar.

Somu uppgávur, men hvørt á sínum øki.

Vaktartænastan er ein stovnur *undir* landsstýrinum, sum vegna landsstýrið kann støðga arbeiði á friðaðum økjum á sjónum og sum hevur fingið autorisatión, vegna landsstýrið, at senda mál til ákæruvaldið.

Natúrfriðingarnevndin er nevnd *undir* landsstýrinum og kann heita á landsstýrið um at støðga arbeiði á friðaðum økjum á landi, og má tað tí metast at vera uppgáva landsstýrisins at støðga tílíkum málum og senda tey til ákæruvaldið.

Í útskrift av gerðabók fyri Natúrfriðingarnevndina fyri Eysturoyar sýslu fyri 16. oktober 1981 verður á bls. 2 sagt:

> »Vísandi til hesar umstøður metir nevndin seg at vera leysa frá hesum máli, og avgerðin frá 22. august 1980 sostatt burtur dottin, tá tað má haldast, at hon er gjørd undir skeivum fyritreytum. Nevndin hevur onga áheitan fingið um loyvi til setan av brennistøðini á annað stað, og heldur ikki umsókn um vegagerð til tað nýggja staðið.«

Arbeiðið við vegagerðini heldur áfram, og er sostatt talan um arbeiði á friðaðum øki, eins og hjá Sjúrðarkletti.

Einasti munur á hesum báðum lógarbrotum er, at kunngerðin, sum Sjúrðarklettur breyt, var kunngjørd primo mai í bløðunum, meðan I.R.F. er gjørt varugt við teirra lógarbrot so seint sum 21. oktober 1981 við nevndu útskrift frá Natúrfriðingarnevndini.

Sjúrðarklettur respekteraði Vaktartænastuna og gavst, meðan I.R.F. heldur áfram.

Skal rættvísi valda í hesum landi, og sama revsing gevast fyri somu brotsverk, so má *antin* skiparin á Sjúrðarkletti fáa fulla uppreisn og eigarin og manning fult endurgjald, eins og sama má galda aðrar skiparar, eigarar og manningar á skipum áður tikin á friðaðum økjum, *ella* má skiparin á I.R.F. (formaðurin í nevndini fyri Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin) koma undir somu kæru og revsing sum, t.d. skiparin á Sjúrðarkletti.

Ábyrgdarmenn á sjógvi sum á landi megu fáa somu revsing fyri sama brotsverk.

Føroya Løgting kann ikki tilstyðja, at teir fiskimenn, sum alt Føroya fólk livir av, skulu verða undirgivnir harðari revsing enn tey, ið liva av teim virðum, hesir fiskimenn føra til lands.

Atkvøðugreiðsla 16. november. Málið fekk 14-0 atkvøður og skuldi sostatt ikki svarast.

---

48. Sjúkradagpeningaskipanin

Ár 1981, mikudagin 11. november legði Jákup Lindenskov, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi:

Tað er roynd lutur, at sjúkradagpeningaskipanin, ið var sett í gildi hin 1. juli 1979, er eitt stórt sosialt framstig fyri tey tímaløntu, fyri fiski- og útróðrarmenn og fyri tey, ið tá fingu høvi til at tekna seg fyri dagpening til dømis húsmøður, vinnurekandi og barnakonur.

Dagpeningaskipanin var sum kunnugt eitt sera umfatandi mál, og tí vóru allir partar greiðir yvir, at ikki var møguligt í fyrstu atløgu at sleppa undan ávisum trupulleikum viðvíkjandi umsiting og veiting.

Somuleiðis er tað almannakunnugt, at henda skipan av ávisum politiskum orsøkum ikki gjørdist so fullfiggjað, sum ynskiligt kundi verið.

Nú hevur skipanin virkað í gott og væl tvey ár og eru allir avvarðandi partar greiðir yvir teir høvuðstrupulleikar, ið eru við hesum tiltaki.

Hesir trupulleikar eru lutvíst av principiellum slagi og lutvíst av umsitingarligum slagi.

Her er hugsað um t.d. hetta, at veitta upphæddin ongantíð er meira enn 80% av einari arbeiðsmannaløn, at peningur ikki verður latin frá fyrsta degi og so er sjálvandi eisini hugsað um spurningin, í hvønn mun arbeiðsmarknaðurin sjálvur eigur at luttaka í teimum útreiðslum, sum standast av dagpeningaskipanini.

Í hesum sambandi kann verða mint á, at ein av fortreytunum fyri dagpeningaskipanin í sini tíð var, at arbeiðsmarknaðurin skuldi luttaka í útreiðslunum við 20% av teimum 80%, sum nú verða latin.

Somuleiðis er her hugsað um teir umsitingarligu trupulleikar, sum veruliga eru við skipanini, og sum merkja, at løntakarin ofta má bíða ov leingi eftir sínum dagpeningi.

Tá vit nú vita um hesar trupulleikar, og vit samstundis hava í huga, at løgtingið undir viðgerðini av hesum máli í sínari tíð var sinnað at byrja í smáum við hesari skipan og so vítt gjørligt vaksa um hana sum frá leið, so má tað nú metast at vera rætt at taka hana upp til viðgerðar aftur. Sett verður nevnd umboðandi teir stovnar og felagsskapir, sum hava mest við dagpeningaskipanina at gera við tí uppgávu at endurskoða hesa skipan og koma við uppskotum um broytingar og ábøtur.

Út frá hesum viðmerkingum loyvir javnaðarflokkurin sær at seta fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Sett verður nevnd at endurskoða sjúkradagpeningaskipanina. Í nevndini sita eitt umboð fyri: Arbeiðarafeløgini, handverkarafeløgini, Fiskimannafelagið, útróðrarfeløgini, Føroya Arbeiðsgevarafelag, almannaumsitingina og Føroya landsstýri. Feløgini og stovnarnir velja sjálvir sínar limir.

Nevndin, ið skal leggja álit fyri løgtingið áðrenn 1. februar 1982, fær álagt at kanna og gera uppskot um

1. at sjúkradagpeningurin verður hækkaður upp í 90%,
2. at útrokningargrundarlagið verður broytt, so at veitingin í størri mun enn nú verður løntakarunum at bata,
3. at arbeiðsmarknaður kemur at luttaka í útreiðslunum av sjúkradagpeningaskipanini,
4. at sjúkradagpeningur verður veittur frá fyrsta sjúkradegi,
5. tiltøk, ið kunnu setast í verk til tess at gera dagpengafyrisitingina so effektiva, at tann, ið eigur sjúkradagpening, kemur at bíða so stutt sum møguligt.

1. viðgerð 19. november. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 22. januar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 19. november 1981 beint í sosialu nevndina.

Nú hevur sjúkradagpeningaskipanin virkað í skjótt 3 ár. Ymisk brek hava vist seg í umsitingini av skipanini, og tað er tað natúrligt, at øll skipanin verður endurskoðað.

Nógv praktisk dømi eru um, at hjálpin ikki virkar sum ætlað, og eiga hesi at verða tikin við í eini kanning. Eisini eiga tey punktini, ið nevnd eru í uppskotinum til samtyktar frá Javnaðarflokkinum at verða viðgjørd.

Tørvur er eisini á almennari upplýsing um dagpeningaskipanina, soleiðis at sloppið verður undan misfatanum og ov litlari vitan um skipanina.

Ein meiriluti (Jógvan Sundstein, Eli Nolsøe, Frederik Olsen og Karin Kjølbro) setir til, í staðin fyri uppskot Javnaðarfloksins, fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta nevnd at endurskoða sjúkradagpeningaskipanina. Nevndin skal vera liðug við sítt arbeiði áðrenn 1. juli 1982.

Ein minniluti (Hilmar Bech) tekur í fyrstu atløgu undir við uppskoti Javnaðarfloksins. Í øðrum umfari tekur hann undir við uppskoti meirilutans.

2. viðgerð 5. februar. Uppskotið frá Javnaðarflokkinum fall við 13-0 atkvøðum. Meirilutauppskot frá sosialu nevndini varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

49. Rentulóg

År 1981, mánadagin 16. november legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot til kongaliga fyriskipan um at seta í gildi í Føroyum ríkislóg nr. 638 frá 21. december 1977 »om renter ved forsinket betaling m.v.«

Viðmerkingar:

Í ymsum lógum eru reglur um morarentur, í summum førum kallaðar processrentur, t.v.s. rentur, sum skulu gjaldast, tá ið skuld ikki verður goldin rættstundis. Henda renta er eftir galdandi lógum 5 ella 6% ella munandi lægri enn vanlig marknaðarrenta.

Eftir lógini, ið skotið verður upp at seta í gildi í Føroyum, verður rentan, ið kann krevjast goldin fyri ov seina gjalding sett til Nationalbankans diskonto + 2% ella í løtuni 11% + 2% ella 13%. Rentan kann krevjast frá forfallsdegnum ella um eingin forfallsdagur er ásettur frammanundan, so frá tí, at ein mánaður er liðin síðan rokning varð send ella krav við sett fram.

Ásetta rentan í lógini fyri at gjalda ov seint kann ikki frávikjast við avtalu millum partarnar til skaða fyri ein forbrúkara t.d. við nýtslu av standardkontraktum, ið innihalda reglur um hægri morarentu.

Reglurnar um hægstu morarentur eru ikki galdandi fyri avtalur við bankar, sparikassar og realkreditstovnar.

Lógaruppskotið er tilevnað aftaná norðurlendskar tingingar og tilsvarandi lógir eru settar í gildi í Noregi og Svøriki.

Viðlagt fylgja serprent av lógini og uppskot til kongaliga fyriskipan.

J.nr.L.A. 1978-46002-5.
Den 23. januar 1979.

UDKAST

Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om renter ved forsinket betaling m.v.

§ *1.* I henhold til § 11 i lov nr. 638 af 21. december 1977 om renter ved forsinket betaling m.v. bestemmes, at loven sættes i kraft for Færøerne.

§ *2.* Loven finder for Færøerne anvendelse på pengekrav, som forfalder den ..... eller senere.

Stk. 2. Lovens § 7 finder for Færøerne også anvendelse på aftaler, der er indgået før den (samme dato som i stk. 1), hvis kravet forfalder den (samme dato) eller senere.

1. viðgerð 19. november. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 8. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum og við 1. viðgerð 19. november 1981 beint í lógarnevndina.

Í lógini verður ásett, hvør renta skal gjaldast, um skuld ikki verður goldin rættstundis, og frá hvørjum mundi rentan kann roknast. Eftir lógini verður rentan sett til ta til eina og hvørja tíð galdandi diskonto + 2%, ella í løtuni tilsamans 13%.

Reglurnar um morarentur í keypilógini og lógini um skuldarbrøv, ið er 5 ella 6% og sostatt ikki longur svarar til marknaðarrentuna, verða samstundis avtiknar.

Frá ríkisumboðnum hevur nevndin fingið viðhefta notat um viðurskiftini millum rentulógina og yvirtikin sermál. Eftir hesum verður eingi til hindurs fyri, at løgtingið í løgtingslógum ásetir eina serstaka morarentu fyri avvarðandi øki.

Tá útlánsrentan í Føroyum er nakað lægri enn í Danmark, heldur nevndin, at morarentan eisini eigur at vera nakað lægri her, og hóskandi kundi verið ásett ájavnt við diskontoina.

Vísandi til hetta setir nevndin fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir fylgjandi uppskot til kgl. fyriskipan um at seta rentulóg nr. 638 frá 21. december 1977 í gildi í Føroyum.

§ *1.* I henhold til § 11 i lov nr. 638 af 21. december 1977 om renter ved forsinket betaling m.v. bestemmes, at loven sættes i kraft for Færøerne med følgende ændring:

1 § 5 udgår ordene »med et tillæg på 2 pst.«

§ *2.* Loven finder for Færøerne anvendelse på pengekrav, som forfalder den ..... eller senere.

Stk. 2. Lovens § 7 finder for Færøerne også anvendelse på aftaler, der er indgået før den (samme dato som i stk. 1), hvis kravet forfalder den (samme dato) eller senere.

J.nr. 30-10-12/1979

NOTAT
om

Lov om renter ved forsinket betaling (Renteloven) i relation til lovgivningen på områder, der i henhold til hjemmestyreloven er gjort til særanliggende.

Loven indeholder bestemmelser om:

I. Forrentning af pengekrav på formuerettens område ved forsinket betaling (§§ 1-6).
II. Morarentens størrelse ved forsinket betaling i forbindelse med forbrugeraftaler (§ 7).
III. Procenrentens størrelse ved retsforfølgning af pengekrav uden for formuerettens område (§ 8).
IV. Procesrentens anvendelse i tilfælde, hvor lovgivningen indeholder bestemmelser om en lavere rente en procesrenten (§ 9).

ad pkt. I.

Punktet omfatter krav på formuerettens område og dermed ikke krav af offentligretlig karakter f.eks. skatte- og afgiftskrav og krav på folke- og invalidepension, tilskud fra det offentlige samt familie- og arveretlige krav.

Den generelle regulering af formueretlige spørgsmål er ikke overtaget som særanliggende. Liste A og B i hjemmestyreloven indeholder ikke punkter, der er dækkende for formuerætten generelt, hvorfor den generelle formueretlige regulering er et rigsanliggende.

Hjemmestyret har som særanliggender overtaget en række områder, der kan

give anledning til formueretlige krav. Som eksempler kan nævnes bygnings- og lejeret samt arbejdsforhold. Eventuelle bestemmelser i lagtingslove om renter ved forsinket betaling på disse områder respekteres af Renteloven i overensstemmelse med lovens § 1, stk. 2.

Renteloven skaber således en ny retstilstand på områder, der er overtaget som særanliggender, når der på disse områder er krav af formueretlig karakter, og hjemmestyret ikke har gennemført særlige rentebestemmelser. Ændringen er dog af generel formueretlig karakter, hvorfor ændringen kan gennemføres ved rigslov. Der vil ikke være noget hinder for, at hjemmestyret senere indfører andre rentebestemmelser ved lagtingslov, jfr. Rentelovens § 1, stk. 2. Kundgørelse af Renteloven på Færøerne vil således på disse områder alene betyde, at undladelse af at skabe særlig færøsk lovgivning medfører, at reguleringen sker efter den almindelige »danske« formueretlige lovgivning, her Renteloven.

Der findes en række velkendte analoge tilfælde. Således kan hjemmestyret regulere lejeområdet fuldt ud, men er der i den færøske lejelovgivning ikke særlige bestemmelser om indgåelse af lejeaftaler, sker reguleringen efter den almindelige »danske« formueretlige lovgivning, her aftaleloven.

Om renten efter påbegyndt retsforfølgning henvises til det nedenfor under pkt. III og IV anførte.

ad pkt. II

Rentelovens § 7 indeholder en generel bestemmelse om rentens størrelse ved forbrugeraftaler. Forbrugeraftaler er ikke i almindelighed et særanliggende og kendtes iøvrigt ikke som begreb i 1948. Generelle bestemmelser om forbrugeraftaler er ved A 483 af 28. november 1979 og bekendtgørelse nr. 569 af 11. december 1980 sat i kraft på Færøerne.

Ved lagtingsbeslutning af 13. maj 1948 vedtoges dog at overtage områderne nævnt under hjemmestyrelovens liste A pkt. 15, herunder »omløben med varer«. Dette er baggrunden for, at danske myndigheder ikke har forelagt spørgsmålet om ikrafttræden for Færøerne af kapitel 2 (Forbud mod uanmodet henvendelse m.v.) i lov om visse forbrugeraftaler som for så vidt angik de øvrige kapitler blev sat i kraft ved nævnte anordning.

I relation til hjemmestyreloven er Rentelovens bestemmelser om renten ved forbrugeraftaler således kun et problem ved forbrugeraftaler, der er indgået under »omløben med varer«, kaldet omførsel.

Hjemmestyret kan indføre særlige renteregler for forbrugeraftaler indgået under omførsel. Renteloven (§ 1, stk. 2) respekterer fuldt ud sådanne bestemmelser. Vedtages ikke særlige rentebestemmelser for omførsel, vil Renteloven også gælde på dette område.

Som det ses, er spørgsmålet helt paralelt, med det under pkt. I, behandlede, idet kundgørelse af Renteloven alene betyder, at undladelse af at skabe særlig færøsk

lovgivning medfører, at reguleringen sker efter den almindelige »danske« formueretlige lovgivning, her Renteloven § 7.

ad pkt. III

For ikke formueretlige krav, altså f.eks. skatte- og afgiftskrav, overføres bestemmelser om renter fra påbegyndt retsforfølgning fra gældsbrevsloven § 62 til Renteloven. For Færøerne betyder overførslen samtidig, at renten stiger fra 5% til diskontoen + 2%, idet renten på Færøerne ikke er reguleret siden 1938.

Renten fra retsforfølgnings påbegyndelse benævnes normalt procesrenten. Typisk er det renten fra det tidspunkt sag anlægges ved retten, men retsforfølgning kan dog også påbegyndes på en række andre måder.

Hjemmestyrelovens liste A og B indeholder ikke begrebet procesrente, hvorfor der i princippet er tale om et rigsanliggende. Renteloven giver dog ligesom § 62 i gældsbrevsloven de færøske myndigheder mulighed for at fastsætte en anden procesrente end den almindelige (nu 5%, efter renteloven diskontoen + 2%) på områder, der er gort til særanliggender, idet Renteloven ligesom gældsbrevsloven hjemler dette.

Renteloven ændrer således ikke ved de bestående relationer mellem rigslove og lagtingslove, men har alene betydning derved, at procesrenten forhøjes væsentligt, se herom nedenfor under pkt. 4.

ad pkt. IV

I de tilfælde, hvor man hidtil ved retsforfølgning af krav inden for særanliggender (f.eks. skatter og afgifter) måtte have anvendt lagtingslovens bestemmelser om procesrenter, skal man i fremtiden anvende diskontoen + 2%, hvis dette medfører en højere rente. Rentelovens § 9 er overført fra gældsbrevsloven, hvorfor der ikke er tale om principielle ændringer. Da procesrentesatsen imidlertid ved Renteloven for Færøernes vedkommende forhøjes væsentligt, kan det tænkes, at rentebestemmelserne i nogle lagtingslove mister deres betydning. Der er dog intet til hinder for, at lagtinget senere ved lagtingslov kan fastsætte en lavere procesrente inden for områder, der er overtaget som særanliggende.

Konklusion

Renteloven indeholder generelle formueretlige regler om renter, ligesom aftaleloven indeholder generelle formueretlige regler om aftaler. Renteloven indeholder endvidere de bestemmelser om procesrente, der nu er optaget i gældsbrevsloven. Rentelovens regler fortrænges, hvis hjemmestyret lovgiver om renter på områder, der er gjort til særanliggender.

Da der således er tale om generelle reguleringer af formueretlig karakter, er det

helt i overensstemmelse med hjemmestyrelovens forudsætninger og hidtidig praksis, at reguleringen sker ved ikraftsættelse af rigslov.

— — — — — — — — — — —

Det bemærkes, at Rentelovens væsentligste betydning for Færøerne er reguleringen af rentesatsen. Renteloven indeholder mulighed for, at rentens størrelse kan være anderledes på Færøerne end i Danmark, hvis dette ønskes af hjemmestyret. Ønsket bør i givet fald gennem rigsombudet forelægges justitsministeriet, før sagen færdigbehandles i lagtinget.

24/11-1981 jdh

9. mars legði ein minniluti (Jóannes Dalsgaard) fram soljóðandi

MINNILUTAÁLIT

Minnilutin Jóannes Dalsgaard vísir á, at allur spurningurin um rentulóggávu í Føroyum er ógreiður.

Samstundis vísir minnilutin á, at so mikið stórur munur er á rentuviðurskiftunum í Føroyum og í Danmark, at tørvur er á føroyskari lóggávu burturav á hesum øki.

Minnilutin mælir tí til, at málið verður sent landsstýrinum aftur, so greiða fæst á lóggávumyndugleikanum á hesum øki og somuleiðis at greiða fæst á, um tað er neyðugt at yvirtaka málsøkið fyri at fáa í lag eina serføroyska rentulóggávu.

Minnilutaálitið varð afturtikið.

2. viðgerð 16. apríl. Málið varð aftur beint í lóganevndina, sum 20. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Undir 2. viðgerð av hesum máli og tingmáli nr. 6: Broytingar í keypilógini, verða málini beind aftur í lógarnevndina.

Við hesum áliti fylgja avrit av ummælum frá Brúkarafelagnum og Føroya Keypmannafelag, ið umrødd vóru í fyrsta álitinum.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og heldur nevndin seg til tilmælið í fyrsta álitinum.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) ásannar, at tað er av týdningi at fáa keypilógina samtykta í hesi tingsetu. Tá fortreytin fyri keypilógini er m.a. ein rentulóg, kann minnilutin fyri ikki at tarna keypilógini taka undir við meirilutanum í tingmáli nr. 49/1981.

Minnilutin metir, at hóast fleiri upplýsingar nú eru komnar fram í spurninginum

um allar rentulóggávuna, so er tað neyðugt, at hesin spurningur verður meira kannaður.

Út frá hesum setir minnilutin niðanfyri standandi uppskot til samtyktar í staðin fyri upprunauppskot sítt:

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið ásannar, at allur spurningurin um rentulóggávu er ógreiður, og áleggur tí landsstýrinum at kanna hendan spurning og leggja úrslitið av kanningini fyri tingið í ólavsøkutingsetuni 1982.

BRÚKARAFELAGIÐ
Hoydalar
3800 Hoyvík
tlf. 15478

Dato 10. febr. 1982
j.nr. 5/82

Løgtingsins lógarnevnd.

Eftir áheitan frá lógarnevndini hevur Brúkarafelagið havt løgtingsmál nr. 6/1981: »Broytingar í keypilóginí« til viðgerðar.

Í kunngerð nr. 28 frá 21. jan. 1980 av »lov om køb« er grein 38 farin úr gildi, tí at lóg nr. 638 av 21. des. 1977 »om renter ved forsinket betaling m.v.« er komin í staðin.

Uppskotið tað føroyska inniheldur ikki hesa lóg, hervið fellir grein 38 burtur og eftir hvat vit duga at siggja kemur einki í staðin.

Um vit hava skilt hetta rætt, so ger hetta støðu brúkarans veikari.

Brúkarafelagið heldur ta donsku lóggávuna verða hóskiliga, men kann bert viðmæla at hon verður sett í gildi um so er at lóg, ið kann avloysa grein 38 samstundis verður lýst.

Brúkarafelagið
Sigrid Dalsgaard fm.

í skjal

Føroya Keypmannafelag
Bøkjarabrekka 9
3800 Tórshavn

Tórshavn, 17, februar, 1982

Føroya Landsstýri
Løgtingsins lógarnevnd
3800 Tórshavn

Att. harri J. Hilduberg

Vit vísa á bræv tykkara 26. januar 1982 og okkara svar 28. januar.
Aðalfundur okkara var 15. februar, og var broyting í keypilógini til viðgerðar.
Frá okkara felag skulu vit siga, at vit ongar viðmerkingar hava til nevnda lógaruppskot.

Við heilsan

Føroya Keypmannafelag
3800 Tórshavn
Hans Thomsen form.

20. apríl legði Petur Reinert, løgtingsmaður fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

UPPSKOT
til
samtyktar

Av tí at tað í hesum máli eins og í fleiri øðrum førum hevur vist seg, at ivi er um hvørji mál, ið kunnu gerast sermál og hvørji ikki, metir tjóðveldisflokkurin, at heimastýrislógin er ónýtilig sum stjórnarligt grundarlag undir tilveru okkara sum frælsborin tjóð, og tí

samtykkir løgtingið í fyrstu syftu, at heimastýrislógin verður avtikin, og

samtykkir løgtingið í aðru syftu at seta nevnd at tingast við ríkismyndugleikarnar um broytingarnar í heimastýrislógini.

Framhaldandi 2. viðgerð 22. apríl. Uppskotið frá nevndini samtykt við 22-0 atkvøðum. Uppskotið frá minniluta í nevndini (Petur Reinert) 1 og 2 fullu bæði við 7-0 atkvøðum. Uppskotið frá einum øðrum minniluta (Jóannes Dalsgaard) fall við 13-0 atkvøðum. Minnilutaálitið frá Jóannesi Dalsgaard varð afturtikið.

F.L.j.nr. 625-1

---

50. Fyrispurningur til løgmans

Ár 1981, friggjadagin 13. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Vilhelm Johannesen, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

Í Dagblaðnum fyri mikudagin 11. november havi eg lisið grein, ið er skrivað av blaðstjóranum, har hann m.a. skrivar um tvey týdningarmikil mál í tí valdømi, sum eg eri valdur at umboða her á tingi. Nevniliga um vega- og bergholsarbeiðið í Kalsoynni og um Ellis- og røktarheimsbyggingina í Klaksvík, sum eisini umfatar eina útbygging av sjálvum sjúkrahúsinum.

Blaðstjórin á Dagblaðnum er løgtingsmaður, og hann er eisini ein av teimum 17, ið stuðla landsstýrið hjá Paula Ellefsen, løgmanni. Greinin í Dagblaðnum er skrivað í sambandi við eina grein hjá løgmanni í Dimmalætting leygardagin frammanundan. Greinin hjá blaðstjóranum er beinleiðis skrivað um og til løgmann, og tí haldi eg tað vera av týdningi at seta løgmanni og samgonguni nakrar spurningar í hesum sambandi. Men fyrst eitt brot úr greinini hjá blaðstjóranum og løgtingsmanninum:

»Fólkaflokkurin gekk undir ynski samgongurnar at spara í verandi fíggjarári. Á samferðsluøkinum, bæði hjá SL og Landsverkfrøðinginum, gjordu vit neyðugar skerjingar í útreiðslum landskassans. Vónandi fylgir landsstýrið neyvt við til dagligt, hvussu hesir stovnar klára at fylgja fastløgdum játtanum.

Løgmaður eigur ein partamann í Tinganesi, sum hevur almanna- og skúlamál um hendi.

Eftir at hava lisið fyrndarorðini í Dimmu leygardagin, kennir ein seg meiri róligan. Tí herfyri tóktist, sum partamaður løgmans helt hondina yvir einum ellis- og røktarprojekti í Klaksvík uppá 60 miljónir. 60 mió. krónur til 30 búfólk merkir eina útreiðslu upp á 2 mió. kr. pr. búfólk ella song á nevnda ellis- og røktarheimi.

Eini 10 fólk búgva á Trøllanesi. Játtaðu vit t.d. 2 mió. kr. til hvørt teirra, fingu tey ein tunnil fyri 20 mió. kr. Er trøllanestunnilin eitt vilt projekt, er umtalaða ellis- og røktarheimið fíggjarliga ábyrgdarleyst.

Grein Ellefseus leygardagin ber prógv um, at landskassin skal spara á øllum økjum. Spart hevur verið í Kalsoynni. Nú ivast vit ikki í, at løgmaður eisini sær ørskapin í at ofra 60 mió. kr. til eitt ellis- og røktarheim í Klaksvík.

Væl vita vit, at henda ætlan í Klaksvík er nógv eldri enn okkara nýggja landsstýri. Men vit gleðast um, at sami spariandi, sum hevur verið galdandi í Kalsoynni, verður galdandi í vitleysa ellis- og røktarheimsøkinum.« citat enda.

Óli Breckmann, løgtingsmaður og blaðstjóri hevur verið í iva um støðuna hjá løgmanni og partamanni hansara í Tinganesi. Hann hevur borið ótta fyri, at partamaður løgmans í Tinganesi fór at halda hondina yvir einum Ellis- og røktarheimsprojekti í Klaksvík uppá 60 mió. kr., men nú kennir blaðstjórin seg meiri tryggan. Hann hevur fingið ta fatan av løgmanni, at sami spariandi, sum er galdandi í Kalsoynni, eisini skal galda á Ellis- og røktarheimsøkinum.

Men eg og fleiri við mær kenna okkum rættuliga ótrygg. Vit høvdu vóna at vega- og bergholsarbeiðið í Kalsoynni helt fram í komandi fíggjarári og at røktarheimsbyggingin í Klaksvík fór at verða framd sambært tað góðkenda projektið.

Óli Breckmann hevur nú fingið ta fatan av løgmanni, at spariandin framvegis skal ráða í Kalsoynni, og at sami spariandi skal blásast yvir røktarheimsbyggingina í Klaksvík.

Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum loyvi eg mær at seta soljóðandi fyrispurning til Paula Ellefsens, løgmann:

1. Taka løgmaður og samgongan undir við samgongumanninum Óla Breckmann tá hann skrivar, at Trøllanestunnilin er eitt vilt projekt, at ætlaða Ellis- og røktarheimið í Klaksvík er fíggjarliga ábyrgdarleyst og tá hann nýtir orð sum »ørskapur« og »vitloysi« í sambandi við nevndu røktarheimsbygging?

2. Ætlar samgongan at halda fram við bergholsarbeiðnum í Kalsoynni í komandi fíggjarári og ætlar samgongan at fremja røktarheimsbyggingina í Klaksvík eftir tí projekti, sum er góðkent, og sum peningur eisini er játtaður til?

Atkvøðugreiðsla 16. november. Málið fekk 16 0 atkvøður og skuldi sostatt ikki svarast.

F.L.j.nr. 1030-3-1.

51. Løgtingslóg um keyp av ogn til HF-skeiðið í Klaksvík

Ár 1981, mánadagin 16. november legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um lán til keyp av ogn til HF-skeiðið í Klaksvík.

lagtingslov om lån til køb af ejendom til HF-kurset i Klaksvik.

§ *1.* Landsstýrið verður landskassans vegna heimilað at læna kr. 1.650.000,- til keyp av ognini matr. nr. 379 i Klaksvík til HF-skeiðið i Klaksvik.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at låne kr. 1.650.000,- til køb af ejendommen matr. nr. 379 i Klaksvik til HF-kurset i Klaksvik.

§ *2.* Henda lóg kemur i gildi beinan vegin.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

HF-skeiðið í Klaksvík hevur, síðan tað varð sett á stovn, hildið til í leigaðum hølum í húsunum á matr. nr. 379 i Klaksvik, men útleigarin hevur nú sagt leigusáttmálan upp við tí grundgeving, at hann ynskir at selja ognina.

Av tí at tað ikki er møguleiki fyri at útvega onnur hóskandi høli í Klaksvík til HF-skeiðið, hevur landsstýrið eftir tilmæli frá landsskúlafyrisitingini í samráð við fíggjarnevnd Føroya Løgtings samtykt at keypa ognina fyri 1,6 mió. kr. við rentu 8 3/4% frá 27. mai 1981 til endaligt ognarbræv er tinglýst.

Grundøkið er umleið 368 m², og húsastøddin er 11,2 m × 15 m i 4 hæddum.

Ognin er av Norðoya Sparikassa mett til 1,7 mió. kr.

Norðoya Sparikassi hevur givið landsstýrinum tilsøgn um eitt lán stórt 1,65 mió. kr., sum rindar keypsprísin, provisión og tinglýsing av pantibrævinum, og sum verður at afturrinda yvir 15 ár við 13 1/2% um árið i rentu.

1. viðgerð 25. november. Málið varð beint i skúlanevndina, sum 16. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 16. november 1981 og varð undir 1. viðgerð 25. november 1981 beint í skúlanevndina.

Landsstýrið hevur áður lagt spurningin um keypið av ognini fyri ítggjarnevndina, sum hevur samtykt keypið.

Ein samd skúlanevnd tekur vísandi til hetta undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 16. december. § 1 varð samtykt við 30-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð seinni sama dag. Uppskotið varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2104-2-4-1. Lóg nr. 7 frá 30. jan. 1982.

---

52. Fyrispurningur til løgmans

Ár 1981, mánadagin 16. november boðaði formaðurin frá fyrispurninginum frá Adolf V. Hansen, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

1. Hvørji fyrivarni hevur ella fer landsstýrið at taka í samband við, at á Christiansborg er støðan eftir kavbátagøluna í Karlskrona gjørd upp soleiðis:

> »Det sømilitære billede i Nordeuropa og Nordatlanten er ændret. En orlogskaptajn, der i fremtiden i en norsk fjord (som det så ofte er sket tidligere) kaster dybvandsbomber mod en formodet øst-u-båd må regne med, at den er forsynet med kernevåben og tage det med ind i sine overvejelser. Det gælder naturligvis også de grønlandske fjorde, den svenske skærgård og færøsk søterritorium, hvor der ofte sker krænkelser — begået af fremmede neddykkede u-både.?«

2. Eru løgtingssamtyktirnar, um at vápn ikki má vera á føroyskum øki, galdandi eisini fyri russar?

Viðmerkingar:

Í Kristeligt Dagblad nr. 33 fyri leygardagin 7. november 1981 hevur danski uttanríkisministarin, Kjeld Olesen, nøkur úttalilsir harav m.a. framgongur, at russiskir (og aðrir) kavbátar við kjarnorkuvápnum um borð ofta gera brot á føroysk sjóøki (territorium).

Fyri at lýsa málið so gjølla sum gjørligt er nevnda grein í Kristiligt Dagblad nr. 33 viðløgd.

KJELD OLESEN: SOVJET HAR VIST HERREFOLKS—MENTALITET

— Tilliden kan ligge på et lille sted, siger udenrigsministeren efter u-båds- og spionagesagen

Med et udtryk fra besættelsestiden satte udenrigsminister Kjeld Olesen i går problematikken omkring u-båds-affæren og spionsagen i relief. — Det er en herrefolks mentalitet, som er helt uacceptabel, sagde han efter et møde i udenrigsnævnet, hvor begge sager blev drøftet.

— De belaster forholdet mellem Norden og Sovjetunionen, og det vil vare lang tid, før tillidsforholdet er genoprettet. Tilliden til sovjetunionen kan ligge på et meget lille sted, sagde udenrigsministeren videre. U-båds-affæren har gjort det klart, at når Sovjet taler om atomfrie zoner i Norden, må der også tænkes på Kolahalvøen. Østersøområdet og Baltikum.

GRAVERENDE FORHOLD

Om vor hjemlige spionsag fremhævede udenrigsministeren, at han finder to forhold i forbindelse med den anholdte forfatter graverende.

1) Han har videregivet falsk materiale fra den sovjetiske ambassade vedrørende Kina til den nordkoreanske ambassade, og han har 2) kanaliseret midler fra Sovjetambassaden til danske fredsbevægelser.

Udenrigsministeren understregede, at man i regeringens sikkerhedsudvalg har drøftet sagerne og fundet grundlag for de skridt, der er taget. Sagen, der som bekendt omfatter udvisningen af en sovjetisk diplomat, betegnes af Kjeld Olesen som »kedelig«. Han advarer imidlertid mod, at den giver anledning til urimelig hetz mod de kræfter, som arbejder reelt for freden.

DEBATTEN LAMMES

I tilslutning til Kjeld Olesens udtalelser om spionsagen siger Frenskridtsmanden Uffe Thorndahl, at den bedste måde at bekæmpe de sovjetiske infiltrationer på, givetvis vil være at give den danske offentlighed en åben og detaljeret orientering om

sammenhængen mellem Sovjets Efterretningstjeneste og vore såkaldte fredsbevægelser.

Formanden for Folketingets forsvarsudvalg Palle Simonsen siger, at det foruroligende omkring de sovjetiske u-både mindre er atombevæbningen. Det vidste vi i forvejen, bl.a. når det gælder de seks u-både, der specielt holder vagt omkring danske farvande. De er imidlertid på internationalt territorium, men det alvorlige er, at de nu påtræffes i svensk farvand. Udvalgsformanden mener som flere andre politikere, at u-bådsepisoden vil lamme debatten om fredsbevægelserne og om den atomfri zone.

Det er klart hvilken udfordring vi står overfor, siger Palle Simonsen, der imidlertid ser det positive i, at opinionen reagerer, hvilket igen kan få indflydelse på indstillingen til forsvaret og tilgangen til værn og hjemmeværn.

ÆNDRET SØMILITÆRT BILLEDE

På Christiansborg gjorde man i aftes situationen sådan op: 1) Det sømilitære billede i Nordeuropa og Nordatlanten er ændret. En orlogskaptajn, der i fremtiden i en norsk fjord (som det så ofte er sket tidligere) kaster dybvandsbomber mod en formodet øst-u-båd må regne med, at den er forsynet med kernevåben og tage det med ind i siner overvejelser. Det gælder naturligvis også de grønlandske fjorde, den svenske skærgård *og færøsk søterritorium,* hvor der ofte sker krænkelser — begået af fremmede neddykkede u-både.

2) De ældre sovjetiske diesel-u-både som man regnede med skulle udrangeres ved denne tid, synes i stedet at være blevet renoveret og benyttes nu bl.a. til efterretningsvirksomhed.

3) Man vidste i forvejen at nogle af disse mindre diesel-drevne u-både kunne være armeret med kernevåben — anbragt i raketter.

Sagkyndige troede imidlertid at disse missiler var afmonteret under efterretningsvirksomhed på fremmed territorialfarvand. For fremtiden må man ikke alene forvente, at missilerne fortsat er til stede med kernevåben, men også med, at der på bådene befinder sig atom-armerede torpedoer og atomminer.

STORT ANTAL

Det er de mindre, manøvredygtige diesel-ubåde, der bedst kan anvendes til efterretningsvirsomhed nemlig mærkerne whisky, zulu, romeo og foxtrot — alle Nato-navne. Antallet er svært at gøre op, men i slutningen af 70'erne regnede sagkyndige med, at der stadig var 24 whisky-både, 19 zulu-både, 12 romeo-både og ca. 40 af mærket foxtrot. De kan alle være forsynet med atom-torpedoer, whisky-både tillige med atom-miner, Whisky-bådene kan endvidere bære missiler af mærket SS-N3 (shaddock) og Zulu-bådene SS-N4 (Sark). Begge er nukleare. Imidlertid er

langt fra alle disse både placeret i Østersøen. Henved en trediedel menes at være stationeret i sortehavet eller Det fjerne Østen.

De seks større golf-diesel-u-både, udstyret med SS-N5 raketter er i Østersøen. Deres raketter er også forsynet med atom-sprænghoveder.

brø.

18. november varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

10. februar svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í hesum løgtingsmáli hevur Adolf V. Hansen, løgtingsmaður sett mær hesar tveir spurningar:

1. Hvørji fyrivarni hevur ella fer landsstýrið at taka í samband við, at á Christiansborg er støðan eftir kavbátagøluna í Karlskrona gjørd upp soleiðis:

   »Det sømilitære billede i Nordeuropa og Notdatlanten er ændret. En orlogskaptajn, der i fremtiden i en norsk fjord (som det så ofte er sket tidligere) kaster dybvandsbomber mod en formodet øst-u-båd må regne med, at den er forsynet med kernevåben og tage det med i sine overvejelser. Det gælder naturligvis også de grønlandske fjorde, den svenske skærgård og færøsk søterritorium, hvor der ofte sker krænkelser — begået af fremmede neddykkede u-både?«

2. Eru løgtingssamtyktirnar, um at vápn ikki má vera á føroyskum øki, galdandi eisini fyri russar?

ad. 1. Tað er ikki landsstýrinum kunnugt, um tað her í Kristeligt Dagblad fyri leygardagin 7. november 1981 endurgivna ummæli frá Christiansborg er frá ríkisstýrinum og um so er, um tað er beint endurgivið. Siður er tað ikki í landsstýrinum at nýta blaðgreinina sum støði undir fyrispurningum ella áheitanum til ríkisstýrið.

Lagt kann tó verða afturat, at landsstýrinum kunnugt eru ikki prógv fyri, at fremmandir kavbátar hava verið innanfyri territorialmarkið uttan loyvi.

ad. 2. Hvussu langt hesar samtyktir røkka, er undir avgerðarrætti løgtingsins, eftir landsstýrisins metan eru tær generellar og ti galdandi fyri øll.

53. Íbúðagrunnur

Ár 1981, mánadagin 16. november legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum sum skjótast at velja sin lim í stýrið fyri Íbúðargrunnin og løgtingið áleggur somuleiðis landsstýrinum at gera reglur fyri virki grunsins soleiðis, at hesin grunnur kann fáast at virka.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt er íbúðatrotið í Tórshavn og øðrum føroyskum býum framvegis ein hin mest átrokandi sosiali sputningurin.

Sum støðan er á íbúðamarknaðinum við troti á grundstykkjum, ovurhøgum grundstykkjaprísum, avmarkaðum og dýrum lánmøguleikum og støðugt hækkandi prísum á byggitilfari, eigur alt at verða gjørt, sum gerast kann frá almennari síðu til tess at bøta um íbúðaneyðina.

Ein møguleiki er, at Íbúðagrunnurin verður fingin at virka, so at tær 8 milliónirnar, sum í løtuni standa í hesum grunni, kunnu koma teimum mongu, sum í dag standa uttan íbúð, til góðar.

Fortreytirnar fyri, at hesin grunnur kann fáast at virka, eru hesar:

Fyri tað fyrsta, at grunnurin fær eitt stýri og eina reglugerð, soleiðis sum ásett í lóg nr. 100 frá 1. december 1978. Fyri tað næsta, at áhugi er hjá kommunu ella kommunum fyri at nýta telt møguleikar, sum grunnurin gevur.

Sum støðan er í løtuni, eru hesar fortreytir lutvíst uppfyltar við tað, at Tórshavnar kommuna hevur sýnt áhuga fyri at nýta grunnin við at velja sínar tveir limir í stýrið fyri grunnin. Sum kunnugt er stýrisskipan grunsins soleiðis, at avvarðandi kommuna eigur at velja tveir limir fyri hvørja íbúðabygging, sum er ætlað at seta í verk, og so sita teir løgtingsvaldu og tann landsstýrisvaldi í stýrinum fyri hesa bygging.

Javnaðarflokkinum kunnugt hava hvørki løgting ella landsstýri enn valt sínar limir og tað er mikið spell, tí so leingi hetta ikki er hent, fær grunnurin jú ikki virkað. Í brævi til tingformannin dagfest hin 16. november 1981 heitir Javnaðarflokkurin á formannin um sum skjótast at skipa fyri vali av løgtingsins umboðum í stýrinum fyri Íbúðagrunnin.

1. viðgerð 25. november. Málið varð beint í socialu nevndina, sum 19. mars 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av favnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 25. november 1981 beint í sosialu nevndina.

Síðani tá hevur landsstýrið lagt fram lógaruppskot um, at stýrið fyri Húsaláns-grunnin skal fyrisita íbúðagrunninum saman við kommunuvaldum ella felags-valdum limum.

Nevndin visir tí til álit sítt í tingmáli nr. 90 og setir í staðin fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um sum skjótast at gera ta ásettu reglugerðina yvir virki íbúðargrunsins.

2. viðgerð 22. mars. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 90: Broyting í løgtingslóg um íbúðagrunn.

Uppskot til samtyktar frá nevndini samtykt við 27-0.

F.L.j.nr.

54. Fyrispurningur til løgmans

Ár 1981, mánadagin 16. november boðaði formaðurin frá fyrispurninginum frá Vilhelm Johannesen, løgtingsmanni.

FYRISPURNINGUR

1. Ætlar landsstýrið at fara undir bergholsgerðina norður á Trøllanes í komandi fíggjarári?

2. Ætlar landsstýrið at fremja røktarheimsbyggingina í Klaksvík so sum ætlað?

18. november varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

10. februar svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis:

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 54/1981 hevur løgtingsmaðurin Vilhelm Johannesen sett mær hesar spurningar:

1. Ætlar landsstýrið at fara undir bergholsgerðina norður á Trøllanes í komandi fíggjarári?
2. Ætlar landsstýrið at fremja røktarheimsbyggingina í Klaksvík so sum ætlað?

Viðv. 1. spurningi:
Landsstýrið ætlar ikki at fara undir bergholsgerðina norður í Trøllanes í komandi fíggjarári, tá semja ikki fæst um hetta í landsstýri og/ella samgongu.

Viðv. 2. spurningi:
Landsstýrið ætlar at fremja røktarheimsbyggingina í Klaksvík eftir fyriliggjandi ætlan.

---

55. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann

Ár 1981, hósdagin 19. november varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningur frá Hans M. Joensen, løgtingsmanni sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Nú høvuðsumvæling av motorunum á ferðafólkaskipinum »Rituni« í næstum fer

fram, er so ætlanin 1) at fáa núverandi motorar útskiftar við aðrar, ið skapa minni óljóð, ella 2) at »lappa« um teir niðurslitnu motorar, sum enn standa í »Rituni«?

Viðmerkingar:

Tað hevur nú leingi ligið á ljóði, at ein høvuðsumvæling av motorunum umborð á ferðamannaskipinum »Rituni« verður at fara fram — ella núverandi motorar verða skiftir út.

Fólk, sum dagliga ferðast við »Rituni«, hava nú vónað og glett seg til, at hesir molorarnir fóru at verða útskiftir vegna tann ótolandi larmin, teir gera, serliga í salongini, har ferðafólkið heldur til.

Sjúk fólk verða ofta flutt við »Rituni«, og er hesin larmur uttan iva ógvuliga órógvandi og generandi fyri hesi fólk. Sum kunnugt er læknabáturin, sum skal røkja tað økið, sum siglingin hjá »Rituni« fevnir um, 40 ára gamal og í sera vánaligum standi. Tí verður »Rilan« ofta nýtt til sjúkraflutning.

Um núverandi motorar á »Rituni« kann annars verða upplýst, at gearini eru farin úr framleiðslu, so eykalutir til teirra fáast ikki longur. Ljósmotorarnir hava ongantíð verið nóg stórir. Arbeiðir skipið við krananum -- og tað er neyðugt við allari í- og avskiping av farmi — so má hitin í skipinum sláast frá. Tað má sigast at vera vánalig service at bjóða fólki í dag.

Tað ljóðar, at motormálið á »Rituni« verður framt fyrst í komandi ári. Alment er enn einki sagt um, hvørja loysn landsstýrið velur. Verða teir niðurslítnu motorarnir skiftir út, sum vónandi er, so er upp á tíðina, at landsstýrið nú tekur støðu til aðrar motorar.

Tí er hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum í samferðslumálum.

19. november varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

23. november svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Fyrispurningurin ið varð settur 18. november 1981 ljóðaði soleiðis:

1. Er ætlanin at fáa núverandi motorar á »Rituni« skiftar úr við aðrar, ella
2. Er ætlanin at »lappa« um teir niðurslitnu motorar, sum enn standa í henni?

Tað hevur nýliga verið kannað, hvat er rætt at gera við maskinariið á »Rituni«, tí
1. motorarnir larma illa,
2. teir fara at eldast, og
3. skipið skal klassast.

Viðvíkjandi larminum hava vit fingið at vita, at hann er so mikið nógvur, at tað kann skaða hoyrnina hjá manningini og eisini er hann til ampa fyri tey, sum ferðast við. Tí eigur nakað at verða gjørt við hetta.

Motorarnir eru um 10 ára gamlir, og mugu í minsta lagið yvirhálast væl og virðiliga.

Klassingin av skipinum skal verða liðug í vetur.

Frá sakkunnleikanum hava vit fingið at vita, at um vit ætla at halda fram at sigla við »Rituni« nógv ár aftrat, so er rætt at skifta motorarnar út.

Nú eru ætlanir um at broyta siglingina uppá Sandoynna munandi solciðis, at tað valla verður skip sum »Ritan«, sum tá kemur at røkja siglingina.

Henda broytta siglingin, sum kemur at verða millum Skopun og Kirkjubø, ætlast at verða klár um trý ár.

Tí hava vit spurt, um »Ritan« kann verða nýtilig eini trý ár aftrat uttan alt ov stórar útreiðslur.

Vit hava fingið at vita, at um motorarnir verða klassaðir nú í vetur, og maskinrúmið verður bjálvað av nýggjum, so er avgjørt forsvarligt at halda fram við »Rituni« í 3-5 ár aftrat, og um maskinrúmið verður bjálvað av nýggjum, so skuldi eisini larmurin verið doyvdur soleiðis, at tað verður munandi betur at vera umborð á »Rituni«.

Út frá hesum og við tí fyri eyga, at tað skjótt skal nýtast eitt annað skip til Sandoyarsiglingina, verða motorarnir ikki útskiftir nú, men klassaðir. Hetta verður mett at kosta nógv minni enn at skifta út.

F.L.j.nr. 1803-6.

---

56. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi føroysku-donsku fíggjarviðurskiftunum

Ár 1981, hósdagin 19. november legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið velur 7-manna millumtinganevnd við teirri uppgávu at gera uppskot um nýskipan í fíggjarviðurskiftum Føroya og Danmarkar, soleiðis at donsku fíggjarveitingarnar minka so hvørt sum ræði løglings og landsstýris yvir føroyskum viðurskiftum veksur.

Viðmerkingar:

Í teimum 5 fíggjarárunum 1975-76 til 1979-80 vóru útreiðslur danska ríkisins til Føroya samanlagt 1.430.5 mió. kr. ella í meðal 286,1 mió. kr. um árið. Av hesum gingu 1.279.2 mió. kr. til rakstrarútreiðslur, sum verða 255,8 mió. kr. í árligum meðaltali, ella 89,4% av samanløgdum útreiðslum. Til íløgur gingu í teimum somu 5 fíggjarárunum samanlagt 151.3 mió. kr., sum verða 30.3 mió. kr. í árligum meðaltali, ella 10,6% av samanløgdum útreiðslum.

Hesi útreiðslutøl verða nærri viðgjørd seinni í hesum viðmerkingum, men her skal bejnan vegin viðmerkjast: árið 1979 vóru samanlagdar útreiðslur danska ríkiskassans til »føroysk endamál« settar upp við 383,3 mió. kr. Men av hesum gingu 2,8 mió. kr. til danska ríkisumboðið, 51,6 mió. kr. til donsku verjuskipini, 5,2 mió. kr. til danska marinedistrikt og 17,9 mió. kr. til »Flyvestation Thorshavn«, ella samanlagt 77,5 mió. kr. Hesar útreiðslur — 20,2% av teimum 383,3 mió. kr. — kunnu ikki, soleiðis sum gjørt verður, skuldskrivast okkum føroyingum, men mugu roknast sum útreiðslur danska ríkisins av at útinna og uppihalda politiska og hernaðarliga valdi sínum yvir Føroyum.

Um hesar donsku fíggjarveitingar til Føroya eru í gildi fjøld av lógum og reglum — ikki færri enn 75 í tali. Tað var tí heilt náttúrligt at danska ríkisstjórnin ynskti at fáa alt hetta málsøki, sum undir einum kann kallast »fíggjarveitingar danska ríkiskassans til føroysk endamál«, nærri kannað við tí í hyggju at fáa settar greidligari og einfaldari reglur fyri hesar veitingar.

Heystið 1977 setti so danska forsætisráðið 5-manna embætismannanevnd til at taka sær av hesum máli, t.e. at kanna tørv og møguleikar fyri broytingum í hesum reglum. Hetta varð gjørt eftir ynski donsku ríkisstjórnarinnar um í samstarvi við føroyska heimastýrið at føra hesar reglur á jour og at gera tær einfaldari.

Verkevni nevndarinnar var soleiðis tilskilað: *at* kanna tørvin fyri ábótum í stuðulsskipanunum, har ímillum at vísa á møgulig brek í núverandi skipanum fyri flyting av peningi frá ríkinum til Føroya innan fyri tey ymisku útreiðsluøkini, *at* gera uppskot um broytingar í stuðulsskipanini og har ímillum umhugsa, um heildarstudningur innan fyri tey einstøku økini við fyrimuni kunnu koma í staðin fyri núverandi studningsskipan, alt við teirri fyritreyt, at tað ikki vera munandi

broytingar í samanløgdum útreiðslum ríkisins til Føroya, *at* umhugsa, hvussu møguligur stuðul kann tilmátast (regulerast).

Har næst var skilað til, at starv nevndarinnar skuldi snúgva seg um útreiðslur ríkisins í málsøki, ið kunnu yvirtakast, men ikki eru yvirtikin sum føroysk sermál, at núverandi skipanir viðvíkjandi lánitørvi kommununna og vinnulívsins vera uppihildnar og at lán til heimastýrið til almennar íløgur í sermálum framvegis bert verða veittar av Íløgugrunninum fyri Føroyar.

Í embætismannanevndini vóru skipaðir: N.V. Skak-Nielsen, ið var formaður, Leif Groth, A. Rossen, Einar Kallsberg og Johan Djurhuus. Nevndin hevði tríggjar danskar embætismenn sum skrivarar.

Álit nevndarinnar varð útgivið prentað í 1979. Higar til hevur einki verið gjørt við hetta nevndarálit, men nú hevur landsstýrið upplýst, at tað í hesum mánaðinum (november) skal hava samráðingar við donsku ríkisstjórnina um hesi mál, og má tað tí haldast vera sjálvsagt, at løgtingið viðger og tekur støðu til hetta álit og tey uppskot, ið har verða løgd fram.

Nevndin sigur í innganginum til álit sitt, at hon fyrst hevur kannað núverandi skipanir fyri figgjarveitingum og avgerðarmyndugleikum. Við hesum upplýsingum fingnum hevur nevndin bent á tey útreiðsluøki, har tørvur er á broytingum í stuðulsskipanum. Atfinningar sínar móti núverandi skipanum, byggir nevndin sumpart á umsitingarligum viðurskiftum, sumpart á viðurskiftunum millum tann myndugleika, ið avgerðirnar eigur og tann myndugleika, ið peningin veitir.

Tað eru serstakliga tey trý stóru útreiðsluøkini: sosial mál, skúlamál og heilsumál, ið starv nevndarinnar hevur snúð seg um, og har nevndin hevur sett fram uppskot um broytingar.

Somuleiðis sigur nevndin, at hon í uppskotum sínum til broytingar byggir á teimum núverandi studningsskipanum við heilum ella lutvísum veitingum gjøgnum donsku játtanarskipanina. Støða er tí ikki tikin til møgulig seinni ynski viðvíkjandi nýggjum økjum ella til broytingar í núverandi stuðulsformum fyri hesum.

Samanumtikið eru uppskot nevndarinnar hesi:

a. Støddin og reglurnar fyri tilluting av teimum sosialu pensjónunum verða beinleiðis tilskilaðar í viðkomandi ríkislóg. Núverandi skipan við 50% endurgjaldi verður tí uppihildin.

b. Fyri umsiting heimastýrisins av sosialverkinum, heilsuverkinum og skúlaverkinum verða sumpart gjørdar einsljóðandi endurgjaldsskipanir, sumpart ásettar slíkar talupphæddir, ið ikki hava vanda við sær fyri vánaligari nýtslu av peninginum. Endurgjaldið fyri hesi øki verður tí sett til 25% av útreiðslunum.

c. Viðvíkjandi íløguútreiðslunum verður heilt gingið burtur frá endurgjaldsskipanini. Av umsitingarligum orsøkum eigur eisini fyri smærri upphæddir at verða gingið burtur frá endurgjaldsskipanini.

d. Í staðin fyri tær upphæddir, ið ríkið á henda hátt sparir, og í staðin fyri tað sum spart verður við at lækka endurgjaldsprosentið niður í 25%, kemur heildarstuðul frá ríkiskassanum.

Hesi eru so broytingaruppskotini. Sum vit skilja, skuldu ikki fara fram grundvallarbroytingar í hesum málum. Sum heild skal alt ganga sína vanligu gongd við framhaldandi donskum peningi — og tað nógvum — til okkara niðurundirkomna land. Tað er danski forsætisráðharrin, ið eftir ynski frá stjórn sini hevur sett hesa embætismannanevnd við teirri uppgávu at føra donsku stuðulsskipanina á jour og at gera hana lættari at umsita. Annað og meir er hetta so ikki.

Tað er mikið møguligt, at hesi uppskot, verða tey sett í verk, koma at lætta um umsitingina av hesum danska peningi, bæði hjá teimum donsku og teimum føroysku myndugleikunum, men fyri fíggjarligu og politisku menning okkara fáa hesi uppskot ongan sum helst týdning.

Skulu vit gera okkum sanna mynd av donsk-føroyskum fíggjarviðurskiftum, er ikki nóg mikið at halda seg til donsku fíggjarveitingarnar hesi seinastu árini. Tað verður eisini neyðugt at viðgera hetta mál í søguligum samanhangi og taka við tað sum uppi í hesum fíggjarviðurskiftum hongur, og ikki bert peningastreymin úr Danmørk til Føroya, men eisini peningastreymin úr Føroyum til Danmarkar. — Samantikið hetta:

Beinan vegin sum danskt kongsvald fyri 600 árum síðani festi vald sitt yvir landi okkara, byrjaðu danskir kongar, danskir og útlendskir lensharrar, fútar, monopolmenn og aðrir yvirgangsmenn eyðræning og pining av fólki okkara. Hvat henda eyðræning og pining hevur kostað fólki okkara upp gjøgnum øldirnar, verður sjálvsagt ongantíð gjørt upp í peningi.

Ei heldur ber til at gera upp, hvat ið fólk okkara í nýggjari tíð hevur list við at danska ríkisstjórnin fyri 130 árum síðani loyvdi útlendskum veiðiskipum at veiða á landleið okkara — og frá 1901 loyvdi útlendskum trolarum ótarnaðum at grópa á hesi somu landleið, men at hetta eru miljardir oman á miljardir av krónum, vita vit.

Inn í myndina av teimum donsk-føroysku fíggjarviðurskiftunum kemur so eisini handilin millum bæði londini. Í øldir gekk allur handil okkara gjøgnum Keypmannahavn, og eisini aftaná monopolið brast, hevur meginparturin av handlinum gingið tann vegin. Tann fiskur, ið vit seldu til miðalhavslondini, gekk um millumhandlar í Keypmannahavn. Enn hava danskir agentar vinning av útflutningi okkara, og har kann m.a. verða nevnt, at so seint sum í 1950-árunum gekk allur sildaútflutningur okkara til Sovjet gjøgnum danskar agentar.

Men Danmørk hevur altíð keypt ein lutfalsliga lítlan part av føroyska útflutninginum.

Hyggja vit hin vegin at innflutninginum, siggja vit, at vit enn í dag keypa meginpartin — ja so nógv tann størsta partin úr Danmørk.

Samantikið er um hesi viðurskifti at siga, at vit tey seinastu árini hava keypt frá

Danmørk millum stivliga 2/3 og knappar 3/4 av øllum innflutningi okkara, meðan Danmørk hevur keypt millum 1/5 og 1/4 av øllum útflutningi okkara.

Mangt annað kundi verið nevnt, ið vísir, at aftur ímóti teimum mongu donsku miliónunum, ið nú streyma inn í land okkara, koma ikki so lítil virði, ið vit hava list og Danmørk hevur vunnið — tó tað ikki letur seg gera upp í krónutølum.

Lat okkum nú kanna nærri útreiðslur danska ríkiskassans til føroysk endamál.

Sum longu nevnt gongur bert 1/10 til íløgur, meðan allir hinir 9/10 ganga til rakstrarútreiðslur. Av hesum 9/10 gongur so aftur nógv hin størsti parturin til lønir í skúla- og heilsuverkinum og til sosialar veitingar. Hetta sigur okkum so aftur tað, at meginparturin av hesum danska peningi gongur til dagliga nýtslu hjá hesum fólkum: mat, drykkjuvørur, tubbak, klæði, hita, húsaleigu o.s.fr. Av hesum fer so aftur meginparturin til keypmannin (ella keypsamtøkuna) fyri so at enda hjá donsku heilsølumonnunum í Keypmannahavn.

Solciðis sær tá henda ringrás donsku peninganna til Føroya út: Úr danska ríkiskassanum til føroyska landskassan, haðani til lønmóttakarar og móttakarar av sosialum veitingum, haðani til føroysku keypmenninar, fyri so at enda aftur í Keypmannahavn — nú hjá donsku heilsølumonnunum.

Næst er at spyrja: Hvørjir rinda peningin í danska ríkiskassan — har ímillum tann part, ið gongur til Føroya? Tað eru tær donsku lønarstættirnar, har ímillum verkamenn og fólkapensjónistar, ið verða harðast raktar. Keypmenn — harímillum teir heilsølumenn, ið selja vørur til Føroya, munnu har sum her bera lættastu byrðurnar.

Niðurstøðan verður tá tann, at teir, sum bera tyngstu byrðarnar av hesum øllum, tað eru tær donsku lønarstættirnar, har ímillum verkamenn, og teir donsku fólkapensjónistarnir. Tað er hetta danska fólk, ið gevur okkum føroyingum dagligt breyð, drykkjuvørur, tubbak, klæði uppá kroppin o.s.fr. Teir, ið hava vinningin av hesi skipan, tað eru teir donsku heilsølumenninir.

Har næst er at benda á, at hesi viðurskifti eru púra virðisleys fyri land okkara, framburð og menning tess.

Sum longu nevnt ganga 9/10 av danska peninginum til rakstur. Hesin peningur sæst ikki aftur, tá ið hann hevur verið nýttur. Á henda hátt byggir tú einki land upp, á henda hátt skapar tú ikki nøkur varandi virði, á henda hátt skapar tú ongan framburð, onga menning.

Nú siga teir, sum vilja uppihalda hesi nyttuleysu skipan: Tað eru tey gomlu, børnini og tey sjúku, ið fáa meginpartin av hesum donsku pengum. Skuldu tey gomlu sleppa at svølta, børnini gerast analfabetar, tey sjúku liggja hjálparleys? Fyrst og fremst fyri teirra skuldu mugu vit uppihalda hesi skipan.

Men, hetta er bara ikki so. Tað sum teir, ið soleiðis tala, hava umsorgan fyri, ert ikki tey gomlu, børnini og tey sjúku. Tað eru tey ríku í samfelagi okkara, sum við at tvcita hesar byrðar yvir á danskar skattgjaldarar snikja seg undan teimum sjálvsøgdu menniskjaligu og samfelagsligu skyldum, sum á teimum hvíla mótvegis teimum gomlu, børnunum og teimum sjúku.

Niðurstøðan verður tí tann, at hesi — tey gomlu, børnini og tey sjúku — einki

høvdu list, um vit sluppu burtur úr hesum ólagi. Tað sum tá hendi, var tað, at teir, sum higartil hava skákað sær undan hesum skyldum, nú noyddust at ganga undir tær.

Embætisnannanevndin, ið danska ríkisstjórnin setti til at kanna donsku fíggjarveitingarnar til Føroya og at koma við uppskotum til bata, fekk sum vit hava sæð, bundnar hendur. Niðurstøða nevndarinnar mátti ti verða tann, ið hon var: Henda nyttuleysa og óverduga skipan, ið vit liva við, skal halda fram í ókomnum tíðum — bert í eitt sindur broyttum skapi.

Tað hevði verið skilabetri, um danska ríkisstjórnin hevði álagt hesum monnum at kanna og koma við uppskotum um, hvussu vit skuldu komið burtur úr hesum ólíkindum, t.d. soleiðis sum so mangan hevur verið borið upp á mál, at hesar donsku peningaveitingarnar — samtíðis sum vit tóku á okkum ábyrgdina fyri og ræði yvir øllum okkara viðurskiftum — minkaðu eftir ávísum áramáli, lagar til tær heilt hvurvu.

Slík loysn kann grundast á teimum fíggjarligu viðurskiftum, sum í so mangar øldir hava verið millum Føroya og Danmarkar (samanber tað, ið leysliga hevur verið nomið við her framman fyri), og hon hevði somulcíðis verið í samljóði við tann altjóðarætt, sum nú er staðfestur, m.a. eisini av Danmørk (smb. m.a. samtykt Sameindu Tjóða 14. december 1960 um hjálp til ófræls lond til at vinna frælsi), og við tann praksis, sum útintur hevur verið sambært hesi samtykt, soleiðis at tað eru eini 70 áður ófrælsi lond, sum nú hava vunnið frælsi sitt.

Vit mæla ti frá, at landsstýrið tekur upp samráðingar við danskar ríkismyndugleikar við »Betænkning om ændring af tilskudssystemet for Færøerne« sum grundarlagi og seta í staðin fram uppskot um at tingið velur 7-manna millumtinganevnd við teirri uppgávu at gera uppskot um nýskipan í fíggjarviðurskiftum Føroya og Danmarkar, soleiðis at donsku fíggjarveitingarnar minka so hvørt sum ræði løgtings og landsstýris yvir føroyskum viðurskiftum veksur.

1. viðgerð 1. december. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 11. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 19. november 1981 og undir 1. viðgerð 1. december beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum velur løgtingið 7-manna millumtinganevnd við teirri uppgávu at gera uppskot um nýskipan í fíggjarviðurskiftum Føroya og Danmarkar, soleiðis at donsku fíggjarveitingarnar minka so hvørt sum ræði løgtings og landsstýris yvir føroyskum viðurskiftum veksur.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot tjóðveldisfloksins.

Minnilutin (Atli P. Dam) setir fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið velur 7-manna millumtinganevnd við teirri uppgávu at gera uppskot viðvíkjandi ætlaðu samráðingunum við stjórnina um nýskipanir í fíggjarviðurskiftunum Føroya og Danmarkar ímillum.

Henda nevnd skal luttaka í nevndu samráðingum.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at Føroyar gerast fíggjarliga sjálvbjargnar.

2. viðgerð 15. december. Atkvøðugreiðsla 16. december. Uppskotið frá Tjóðveldisflokkinum fall við 7-0 atkvøðum. Uppskotið frá minniluta í fíggjarnevndini (Atli Dam) fall við 13-0. Uppskot frá einum øðrum minniluta (Adolf Hansen) samtykt við 29-0.

F.L.j.nr. 450-2.

57. Brennistudningur til stakar uppihaldarar

Ár 1981, hósdagin 19. november legði sosiala nevndin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um brennistudning til stakar uppihaldarar.

§ *1.* Brennistudningurin sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 verður eisini latin fyri 1981/82 til stakar uppihaldarar við egnum húsarhaldi og sum fáa hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om brændselstilskud til enlige forsørgere.

§ *1.* Brændselstilskud ifølge lagtingslov nr. 26 af 5. maj 1981 ydes også i 1981/82 til enlige forsørgere med egen husholdning og som får hjælp ifølge § 22 i forsorgsloven.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í álitinum frá sosialu nevndini í tingmáli nr. 16/1980: Brennistudningur til pensiónistar og stakar uppihaldarar, segði sosiala nevndin »Viðvíkjandi brennistudningi til stakar uppihaldarar sambært § 22 í forsorgarlógini, verður mælt landsstýrinum til at áleggja sosialu umsitingini at hava líknandi brennistudning fyri eyga«.

Hetta er ikki gjørt í 1981/82 og setur tí sosiala nevndin frammanfyri nevnda uppskot fram.

2. viðgerð 25. november. § 1 samtykt við 25-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu, at fara til 3. viðgerð samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. december. Málið endaliga samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-20 Lóg nr. 78 frá 11. dec. 1981.

58. Partapeningur í P/f Føroya Agngoymslu

Ár 1981, hósdagin 19. november legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um partapening í pf. Føroya Agngoymslu.

lagtingslov om aktiekapital i P/F Føroya Agngoymslu.

§ *1.* Landskassans vegna setur landsstýrið 5 mió. kr. í partapeningi í partafelag, sum hevur til endamáls at tryggja agnveiting samsvarandi tørvi føroysku fiskivinnunar.

§ *1.* For landskassen indskyder landsstyret 5 mill. kr. i aktiekapital i et aktieselskab, der har til formål at sikre agnforsyning i overensstemmelse med de behov, det færøske fiskerierhverv har.

2. stk. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri rakstrarláni til felagið stórt 5 mió. kr.

Stk. 2. Landsstyret får hjemmel til på landskassens vegne at garantere for et driftslån til selskabet på 5 mill. kr.

3. stk. Felagið er meginfelag fyri agnsamtak føroysku fiskivinnunar.

Stk. 3. Selskabet er fællesselskab for det færøske fiskerierhvervs agnsammenslutninger.

4. stk. Navn felagsins er p/f Føroya Agngoymsla og heimstaður tess er Tórshavn.

Stk. 4. Selskabets navn er P/F Føroya Agngoymsla og dets hjemsted er Tórshavn.

§ *2.* Fyri at útvega neyðugan pening til endamálið, verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna, at taka 5 mió. kr. í láni.

§ *2.* For at tilvejebringe nødvendig kapital til formålet, får landsstyret bemyndigelse til på landskassens vegne at optage lån på 5 mill. kr.

§ *3.* Felagið skal fyriskipa agngoymslu í hvørjari sýslu, keypa upp agn ella råvøru til agnframleiðslu, fyriskipa neyðugum agnfluttningi imillum

§ *3.* Selskabet skal administrere agnlager i hver syssel, opkøbe agn eller råvarer til agnproduktion, administrere nødvendig transport mellem

goymslurnar og lata vinnuni agn fyri ein prís, ið er hin sami frá øllum goymslum felagsins.

§ 4. Landsstýrinum er heimilað at veðhalda fyri neyðugum íløgulánum til hvørja goymslu sær, tá hesi kunnu veðtryggjast innanfyri 90% av metingarvirði goymslurnar.

§ 5. Fyri felagnum situr nevnd við sjey limum harav ein er valdur av Føroya Fiskimannafelag, ein av Meginfelag Útróðrarmanna, ein av Føroya Reiðarafelag, triggir av Føroya Løgtingi og ein av Føroya Landsstýri. Hesin seinasti er formaður nevndarinnar. Nevndin setur leiðara og neyðugt starvsfólk at fyriskipa dagliga virki megindeildarinnar og í undirfeløgum, sum verða stovnað samb. § 6.

§ 6. Av partapeningi sínum kann felagið í hvørjum einstøkum føri seta upp til 50% av partapeninginum í sýslufeløg, ið saman við útróðrarsamtøkum, egningarmiðstøðum, flakavirkjum, kommunum ella øðrum stovnsetir agnmóttøku, goymslu og útflýggjan.

2. stk. Har tað ikki er møguligt at stovnseta sýslufelag saman við partaeigarum í økinum, er p/f Føroya Agngoymslu loyvt at stovna undirfelag og útvega allan eginpeningin.

3. stk. Meginfelagnum er heimilað at gera sáttmála við eigarar av frysti-

lagrene og sælge agn til erhververne til en pris, som er det samme for alle selskabets lagre.

§ 4. Landsstyret får hjemmel til at garantere for nødvendige investeringslån til hvert lager for sig, når disse kan pantesikres indenfor 90% af lagrenes vurderingssum.

§ 5. Selskabet, der styres af en bestyrelse på 7 medlemmer, hvoraf en vælges af Føroya Fiskimannafelag, en af Meginfelag Útróðrarmanna, en af Føroya Reiðarafelag, 3 af Færøernes Lagting og en af Færøernes Landsstyre. Det sidste er bestyrelsesformand. Bestyrelsen ansætter leder og nødvendigt personale til at forestå den daglige administration i hovedafdelingen og i underafdelingerne, der stiftes i overensstemmelse med § 6.

§ 6. Af sin aktiekapital kan selskabet i hvert enkelt tilfælde sætte op til 50% af aktiekapitalen i sysselselskaber, der sammen med hjemmefiskeriselskaber, agncentraler, filétfabrikker, kommuner eller andre etablerer modtagelse af agnopbevaring og udlevering.

Stk. 2. Der, hvor det ikker har været muligt at etablere sysselselskab sammen med aktionærer i vedkommende område, får P/F Føroya Agngoymsla tilladelse til at stifte underselskab og fremskaffe hele egenkapitalen.

Stk. 3. Fællesselskabet får hjemmel til at gøre aftale med ejere af fryselagre

goymslum um leigu, afturatbygging, umsiting, felags rakstur, uppisitaragjald, fluttningsgjald og annað, tá nevndin metir, at slík avtala um rakstur felagsins vegna er lagaligast.

§ 7. Felagið verður rikið út frá vanligum rentabilitetsjónarmiðum, tó uttan órimuligan vinning av munimum millum keyps- og sølupris fyri rávøru og agn.

2. stk. Samlaðu útreiðslur samtaksins, herundir møguligar útreiðslur av megingoymslu, verða at líkna á samlaða umsetning meginfelagsins.

3. stk. Nevndin ásetur í samráð við prísásetingarnevndirnar fyri ráfisk og ídnaðarfisk ein rávørupris, ið er galdandi fyri triggjar mánaðar í senn.

4. stk. Til tess at tryggja lagaligasta agnprísin letur landskassin yvir fíggjarlógina agnstuðning til rakstur felagsins, og letur felagið á hvørjum ári áðrenn 1. oktober landsstýrinum eina meting um studningstørvin.

§ 8. Nevndin letur landsstýrinum uppskot til reglugerð fyri rakstur felagsins. Reglugerðin fær gildi við landsstýriskunngerð aftaná góðkenning av Føroya Landsstýri og løgtingsins fíggjarnevnd.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1982.

om leje, tilbygning, administration, selskabets drift, lejeafgift, transportbetaling og andet, når bestyrelsen er af den formening at en sådan aftale om selskabets drift er den mest formålstjenlige.

§ 7. Selskabet drives ud fra sædvanlige rentabilitetsbetragtninger, dog uden urimelig fortjeneste af forskelle mellem købs- og salgsprisen for råvare og agn.

Stk. 2. De samlede udgifter for fællesselskabet, herunder mulige udgifter af fælleslageret, udlignes på den samlede omsætning hos fællesselskabet.

Stk. 3. Bestyrelsen fastsætter i samråd med prisansættelsesudvalgene for råfisk og industrifisk en råvarepris, der er gældende for 3 måneder ad gangen.

Stk. 4. Med det formål at tilsikre den lempeligste agnpris, betaler landskassen over finansloven agntilskud til selskabets drift og giver hvert år før den 1. oktober landsstyret en vurdering om behovet for støtte.

§ 8. Bestyrelsen fremsender til landsstyret forslag til reglement for selskabets drift. Reglementet får gyldighed i henhold til landsstyrets bekendtgørelse efter godkendelse af Færøernes Landsstyre og Lagtingets Finansudvalg.

§ 9. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1982.

Viðmerkingar:

Trupulleikarnir, ið standast av, at vit ikki altið eru førir fyri at hava nóg mikið av góðum feskum agni á goymslu og at vit ikki altið eru førir fyri at taka ímóti feskum agni, tá hetta stendur okkum í boði, eru afturvendandi ár um ár. Hetta er til stóran skaða fyri heimaútróðurin og føroyska línuveiðu sum heild, tá tað stendur øllum greitt, hvussu ómetaliga stóran týdning agnið hevur fyri línuveiðuna.

Trupulleikarnir standast fyri stóran part av, at virkini kring landið, ið eisini skulu taka ímóti og tilvirka fisk, sum tey eisini skulu goyma í styttri ella longri tíð, hava ov lítla frystiorku og ov smáar kuldagoymslur, soleiðis at vit ikki altíð eru førir fyri at taka ímóti og goyma tær nøgdir av góðum feskum agni, ið ofta standa okkum í boði.

T.d. var nógvur høgguslokkur at fáa so at siga kring alt landið í summar. Men orsakað av ov lítlari frystiorku, hendi tað ferð eftir ferð, at virkini fleiri dagar á rað søgdu frá, at tey ikki kundu taka ímóti. Og vegna tørvandi goymsturúm varð ein partur av hesum høgguslokki fluttur av landinum, við tí úrslíti, at vit longu nú eru komnir í ta støðu, at ongin ella nærum ongin høgguslokkur er eftir á goymslunum.

Í størri og størri mun hava menn ásannað, at tað er vorðið til eina samfelagsskyldu, hetta at tryggja nóg mikið av góðum og biligum agni. Umframt tað, sum er nevnt frammanfyri um høgguslokkin, kann verða lagt afturat, at tað eisini eru dømir um, at føroysk nótaskip, sum eru stødd nær við Føroyar, hava boðið sær til at landa feskan makrel til agn her heima, men hava fingið avslag, orsakað av, at eldri innfluttur makrelur hevur ligið á goymslu.

Skotið verður upp at landskassin stovnar pf. Føroya Agngoymslu. Hetta er meginfelag, sum skal stovna sýslufeløg í hvørjari sýslu at taka ímóti, goyma og útflýggja agn. Partapeningurin er 5 mió. kr. Av hesi upphæddi kann felagið í hvørjum einstøkum føri seta upp til 50% av partapeninginum í sýslufeløg, ið saman við útróðrarsamtøkum, egningarmiðstøðum, flakavirkjum, kommunum ella øðrum stovnsetir agnmóttøku, goymslu og útflýggjan. Hetta vil siga, at meginfelagið einsamalt við teimum 5 mió. kr. kann fremja eina íløgu uppá 50 mió. kr. í eina øking av frystiorkuni og kuldagoymslunum.

Javnaðarflokkurin hugsar sær, at felagið kann byggja sjálvstøðug frystivirki við kuldagoymslum, at tað kann byggja saman við verandi ella komandi egningarmiðstøðum, at tað kann byggja saman við verandi og komandi flakavirkjum og at tað eisini kann leiga sær neyðug hølir. Eisini verður skotið upp, at hvar tað er neyðugt kann meginfelagið seta allan eginpeningin í eitt sýslufelag, at landskassin veðheldur fyri einum rakstrarláni uppá 5 mió. kr. til felagið. Landsstýrinum verður eisini heimilað at veðhalda fyri neyðugum íløgulánum til hvørja goymslu sær, tá hesi kunnu veðtryggjast innanfyri 90% av metingarvirðinum.

Endamálið við samtakinum er, at vit í størst møguligan mun veiða agnið sjálvir, at vit hava nóg stóra frystiorku og nóg stórar kuldagoymslur, at allar agngoymslurnar kring landið hava eins gott agn, at allar selja agnið til eins prís, at

prísurin verður rímuligur og at agnstudningurin á figgjarlóginni framyvir verður latin samtakinum.

1. viðgerð 3. december. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av javnaðarflokkinum tann 19. november 1981 og undir 1. viðgerð tann 3. december 1981 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur fingið eitt ummæli frá fiskivinnunevndini í málinum.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kalsberg, Øssur Dam Jacobsen, Guttorm Klein og Juul Jacobsen) kann ikki mæla til at samtykkja lógaruppskotið í ti líki, tað er sett fram. Tilskilað sum støðu teirra, at teir ásanna, at tørvur er á eini størri frystigoymslu og at heitt verður á landsstýrið um at arbeiða viðari við spurninginum og at finna eina loysn.

Minnilutin (Jørgen Thomsen og Ove Mikkelsen) tekur undir við uppskotinum frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið § 1 fall við 14-0.

F.L.j.nr. 1413-1-87.

---

59. Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskap og flakavirkir

Ár 1981, mánadagin 23. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

§ *1.* § 1 í løgtingslóg nr. 7 frá 24. februar 1981 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir verður orðað soleiðis:

»Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1981/82 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum komin eru í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 25 mió. kr.«

§ *2.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.

§ *1.* § 1 i lagtingslov nr. 7 af 24. februar 1981 om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder får følgende ordlyd:

»Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1981/82 at garantere for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25 mill. kr.«

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Orsøkin til at landsstýrið skjýtur upp, at § 1 í verandi lóg um veðhald fyri láni til fiskiskip og fiskavirkir verður broytt, er, at umsóknir eru komnar til landsstýrið um veðhald fyri munandi lánsupphæddum, bæði til fiskiskip og fiskavirkir. 2 skip hava søkt um stuðul upp á umleið 8 milj. kr. hvørt. Onnur skip hava søkt um minni upphæddir. Fiskavirkir hava eisini søkt um kreppuhjálp, upp til 3 milj. kr. fyri hvørt virkið. Fleiri umsóknir eru væntandi, bæði frá skipum og fiskavirkjum. Innkomnar umsóknir fevna um 20-25 milj. kr.

Heimildin í verandi fíggjarári uppá 5 milj. kr. er nýtt. Tá tørvurin fyri restini í hesum fíggjarári longu nú við vissu kann metast at verða mikið hægri enn tær á sinni leysliga mettu 5 milj. kr., og tá helst skuldi verið óneyðugt at hækka heimildarrammuna meiri enn eina ferð í samu fíggjarári, verður mælt til, at veðhaldsupphæddin verður sett til kr. 25 milj. í fíggjarárinum 1981/82, t.v.s. ein hækking upp á kr. 20 milj.

Við hesi broyting fer játtanin fyri 1982/83 og 1983/84 úr gildi. Landsstýrið fer seinni í hesi tingsetu at leggja fram uppskot galdandi fyri komandi fíggjarár.

1. viðgerð 25. november. Varð viðgjørt saman við nr. 60: Lán til endurfigging av

føroyskum fiskiskipum. Bæði málini vórðu beind í figgjarnevndina, sum í. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 23. november 1981 og undir 1. viðgerð 25. november beint í figgjarnevndina.

Undir 1. viðgerð var í løgtinginum heitt á figgjarnevndina um at avmarka veðhaldsupphæddina og at tíðaravmarka heimildarlógina. Upplýst varð, at annað lógaruppskot verður lagt fram seinri í hesi tingsetuni.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Adolf V. Hansen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) er av teirri áskoðan, at upphæddin eigur at verða broytt til 15 mió. kr., og at lógin skal fara úr gildi 31. december 1981 og setir fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT
til uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður í staðin fyri »25 mió. kr.« sett »15 mió. kr.«.	I § 1 ændres »25 mill. kr.« til »15 mill. kr.«
§ 2 verður orðað soleiðis: »Henda lóg fær gildi beinanvegin og fer úr gildi 31. december 1981.«	§ 2 formuleres således: »Denne lov træder i kraft straks og træder ud af kraft den 31. december 1981«.

Ein minniluti (Ove Mikkelsen) førir fram:

Her er talan um eitt kreppulán, ca. 15 mió. kr. og fer lógin úr gildi 31. december 1981, og er henda eykakreppuhjálp neyðug fyri at halda skip og nøkur flakavirkir gangandi árið út. Nýtt uppskot kemur frá landsstýrinum. Tá hetta einans er ein fyribils lóg/hjálp, mælir minnilutin (Ove Mikkelsen) til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Atli P. Dam) metir figgjarnevndarviðgerðina hava prógvað, at ein samtykt av hesum máli einsamøllum er so lítil bati, at hetta als ikki nøktar tann tørv, sum er á bráðfeingisbjálp innan fiskiflotan og á virkjum. Hinvegin framgekk av ti tilfari, nevndin fekk til vega, at ein kreppulánsheimild álei við hesa upphædd saman við uppskoti javnaðarfloksins, hevði verið ein haldgóð loysn ár fram í tíðina. Nevndin sýndi ikki áhuga fyir at meðvirka til slika loysn júst í løtuni, men tykist vilja lata landsstýrinum í hendi at virka við longri varandi loysn eina ferð í komandi

ári. Minnilutin er sera ivasamur um hesa likasælu sum kann bera í sær, at skip og virkir gliða longri út í óføri, tí tey lán, teim standa í boði, í fleiri førum kom at binda tey so á hond og fót, at frælsið at virka seg burtur úr trupulleikunum ikki verður til longur.

Tilfarið, ið varð útvegað eftir umbøn minnilutans, prógvar:

1. Tað er møguligt at útvega løgtingi/landsstýri eitt sera lagaligt 12 ára lán við 11 1/2% í rentu og upp til 5 ára avdráttarfrælsi. Slíkt lán upp á 70 - 80 milj. kr. sum skilabótatiltak fyri fiskivinnuna hevði loyst manga fyritøku frá knógvandi og ónýtiligari figging.

2. Tað er møguligt at skapa endurfiggingarskipan, t.d. soleiðis, at lænt verður í hvørjum føri viðari yvir 12 ár við 1 ára avdráttarfrælsi og 10% rentu. Upplýsing løgmans undir 1. viðgerð av løgtingsmáli nr. 59 og nr. 60 um 15% rentu er tí ikki haldgóð.

3. Tey lán, ið standa skiptum og feløgum í boði eftir slíkari kreppulóg, ið nr. 59 tilmælir, eru so tung, at helst verður farið úr øskuni í eldin. Dømi: 14% í rentu og »deponering« av virkis- og avgerðarrætti til útlendskan banka.

Av tí at landsstýrið einki fløkiligt hevur upplýst um, hvussu ætlanin er at nýta kreppulánsheimildina og heldur ikki er ført fyri í løtuni at gera metingar um, hvussu ein loysn uppá longri sikt kann skapast, er sera torført at taka støðu til, hvussu atkvøðast kann í hesum máli. Roynt verður tí við 2. viðgerð málsins at fáa landsstýrið at upplýsa málið betur, soleiðis at støða tá kann takast á haldgóðari grund.

Frávik í tíðarfreistini til 2. viðgerð varð givið 1. december. Broyting til §§ 1 og 2 samtykt við 29-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 29-0. Málið soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 29-0.

Frávik í tíðarfreistini til 3. viðgerð varð givið á sama fundi. Málið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1413-5-1. Lóg nr. 77 frá 2. december 1982.

60. Lán til endurfíggjan av útlendskum veðskuldabrøvum í føroyskum fiskiskipum

Ár 1981, mánadagin 23. november legði Atli P. Dam, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um skilabótalán fiskivinnunar.

§ *1.* Landsstýrinum saman við fíggjarnevndini er heimilað landskassans vegna at taka upp innan- ella uttanlands lán uppá 70 mill. kr. sum skilabótatiltak fyri fiskivinnuna.

§ *2.* Lánið verður at nýta til endurfíggjan av veðskuldalánum í skipum, sum vegna ólagaliga fígging uttanlands hava óvanliga tungan rakstur.

§ *3.* Landsstýrið og fíggjarnevndin játta í hvørjum einstøkum føri skilabótalán aftaná tilmæli frá »serlánsnevndini«.

2. stk. Hvørt skilabótalánið sær verður at tryggja við sama veð sum tey avloystu uttanlandslánini høvdu. Tó kann loyvast føroyskum banka ella fíggjanarstovni veð innan sama karm, tá slíkir taka lut í endurfíggingini.

§ *4.* Føroya Gjaldsstova umsitur skila-

lagtingslov om refinancieringslån til fiskerierhvervet.

§ *1.* Landsstyret sammen med finansudvalget bemyndiges til landskassens vegne at der optages inden- eller udenlandslån på 70 mill. kr. som refinancieringslån for fiskerierhvervet.

§ *2.* Lånet skal bruges til refinansiering af pantsikrede lån i skibe, som på grund af uhensigtsmæssigt finansiering udenlands har usædvanlig tunge driftsbetingelser.

§ *3.* Landsstyret og finansudvalget bevilger i hvert enkelt tilfælde refinancieringslån efter indstilling fra »serlånsnevndin«.

Stk. 2. Hvert enkelt refinancieringslån skal sikres samme panteret som de udenlandslån havde før de blev afløst. Dog kann tillades færøsk bank eller pengeinstitut pant indenfor samme ramme, når disse tager del i refinancieringen.

§ *4.* Føroya Gjaldsstova administrerer

bótalánini, og kann hon eins lítið og landsstýrið ella fíggjarnevnd játta útsetan við rentu- og avdráttargjaldi, tá lánini eru løgd í fasta legu.

§ 5. Landsstýrið leggur fyri fíggjarnevndina til góðkenningar uppskot um reglugerð fyri skilabótalán til endurfígging.

§ 6. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

refinancieringslånene, og kan denne lige så lidt som landsstyret eller finansudvalget tillade udsættelse med rente- og afdragsbetaling, når lånene er lagt i fast ramme.

§ 5. Landsstyret forelægger finansudvalget til godkendelse forslag til reglement for refinancieringslån.

§ 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í 60'unum og nakað upp í 70'ini lat landskassin vanliga veðhald fyri 70% av byggikostnaðinum, tá føroysk fkip vórðu bygd uttanlands við útlendskari fígging.

Í flestu førum rakk hetta veðhald til samlaða lánið uttanlands.

Tanu nógva byggingin fór fram í Noregi, og var lánitíðin har vanliga 7-8 ár mótvegis 10-15 árum í Føroyum og Danmark. Miðskeiðis í 70'unum varð hendan skipan broytt, soleiðis at landskassin við bygging uttanlands veðhelt fyri 14% av samlaða kostnaðinum.

Meðan gongdin her heima og í Danmark í seinastuni hevur verið hon, at lánitíðin fyri nýbyggingar og størri umbyggingar er longd til 10-12-14 og 15 ár, er lánitíðin uttanlands í mongum førum stytt niður í 5-7 ár. Hetta saman við teim broytingum, ið eru hendar síðani oljuprishækkanina í 1978/81, hevur borið við sær, at fleiri skip vegna ringa fígging eru um at fara av knóranum og at summi eru farin. Í slíkum føri er vandi fyri, at skipið verður tikið út av landinum.

Kreppulánsskipanin hevur bøtt nakað um her, men hon er so háttað, at hon ofta bert loysir tað útlendska haftið fyri 1 og 2 terminir í senn. Tí metir javnaðarflokkurin, at skulu vit sjálvir hava fulla avgerð um hvørji skip tað samfelagsbúskaparliga er forsvarligt at veita hjálp, so mugu veðskuldalánini liggja í Føroyum.

Hetta er galdandi undir verandi umstøðum hesa einu ferð, men kann lættliga broytast aftur. Tí skjýtur flokkurin upp, at hendan loysn er nýtt at ávísari peningaupphædd, meðan veðhaldsheimildir landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar fyri útlendsk skipalán standa við.

At landskassin verður lánveitari, kann bera tann vanda í sær, at ov nógv kemur at hvíla á honum, og mælir tí flokkurin til, at gjaldsútsetan ikki kann játtast veittum skilabótaláni, men at feløg, sum koma undir hesa skipan, verða fyri somu reglum og metingum sum onnur, tá talan verður um almennar veitingar ella stuðul annars.

Á hendan hátt er landskassanum tryggjað so væl sum gjørligt, at endurfíggingarlánið verður afturrindað sum ætlað, meðan treytirnar fyri hjálp til einstaka felagið

eru tær somu fyri øll. Skip kunnu tá framvegis fara av knóranum, bert er fulla avgerðin hesum viðvíkjandi flutt heim til Føroya.

Í einstøkum føri kann tað vera fyrimunur búskaparliga sæð, at uttanlandsskuld verður burturbeind við at skip verður tikið aftur av útlendingum, men fyri tey skip, sum koma undir skipanina, hava vit bert hendan valmøguleika einaferð, tí mælir javnaðarflokkurin til, at serlánsnevndin heldur á við arbeiði sínum, so fortreytirnar fyri hesi meting kunnu vera so góðar sum gjørligt.

At tað umframt tørvi á endurfíggingarláni uttanlands í løtuni er tørvur á nakað størri kreppulánsheimild enn galdandi 5 milj. kr., er helst rætt, og vil javnaðarflokkurin tí taka undir við eini rímiligari hækking av hesi heimild í fíggjarárinum, um landsstýrið mælir til slíkar, t.d. 5 - 6 milj. kr.

1. viðgerð 25. november. Varð viðgjørt saman við nr. 59: Broyting í løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir. Bæði málini vórðu beind í fíggjarnevndina, sum 11. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av Føroya Javnaðarflokki 23. november og undir 1. viðgerð 25. november beint í fíggjarnevndina.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) setir einki uppskot fram og vísir á, at landsstýrið arbeiðir við málinum um fíggjarstøðuna hjá fiskiskipaflotanum.

Minnilutin (Atli P. Dam og Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot javnaðarfloksins og skoytir Atli P. Dam uppí viðmerkingarnar til málið, at longu síðani løgtingsmál nr. 59/1981 — hækkan av kreppulógarheimildini — er játtan givin til eitt skip, sum í tí stóra og heila tók størsta partin av játtaðu heimildar upphæddini og er tískil útslitið av løgtingsmáli nr. 59/1981 eingin loysn fyri eftirverandi tørv.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 15. december. § 1 fall við 14-0. Málið sostatt fallið.

61. Landskassin setur partapening í felag at røkja millumlandasigling.

Ár 1981, mánadagin 23. november legði Atli P. Dam, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um partapening í p/f Smyril.

§ *1.* Stovnað verður partafelag við almennari luttøku undir navninum Smyril við tí endamáli at reka millumlanda ferðamanna- og farmasigling.

2. stk. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at tekna upp til 14 mió. kr. í partapeningi treytað av:

at 7 mió. kr. av partapeningi landskassans verða bodnar út til fría tekning í Føroyum við 1 ára tekningarfrest,

at fyri felagnum situr 5-manna stýri, harav 4 eru valdir av løgtinginum og 1 tilnevndur av landsstýrinum, hesin er formaður,

at fyri hvørja 1.400.000 kr. sum av landskassans partapeningi eru teknaðar og inngoldnar av øðrum, verður 1 stýrislimur valdur av hesum partabrævaeigarum, til samlaða stýrislimatalið er 10,

at eingin einstakur partaeigari uttan landskassin eigur meira enn kr. 2.000.000,- av samlaða partapeninginum,

at umsiting partafelagsins liggur hjá stovninum Strandfaraskip Landsins, og

at Strandfaraskip Landsins rekur

lagtingslov om aktiekapital i p/f Smyril.

§ *1.* Med landskassens deltagelse stiftes et aktieselskab ved navn Smyril. Selskabets formål er at drive udenlands passager- og fragtsejlads.

Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne indtil 14 mio. kr. i aktiekapital betinget af:

at 7 mio. kr. af landskassens aktiekapital udbydes til fri tegning på Færøerne med en tegningsfrist på 1 år,

at der for selskabet sidder en bestyrelse på 5 medlemmer, hvoraf 4 vælges af lagtinget og 1 udpeges af landsstyret, denne er formand,

at der for hver 1.400.000 kr. landskassens aktiekapital, der er tegnet og indbetalt af andre vælges 1 bestyrelsesmedlem af disse aktieejere, indtil det samlede antal bestyrelsesmedlemmer er 10,

at ingen enkelt aktieejer bortset fra landskassen ejer mere end kr. 2.000.000 af den samlede aktiekapital,

at administrationen af aktieselskabet henlægges til institutionen Strandfaraskip Landsins, og

at Strandfaraskip Landsins driver selskabet uafhængigt af Strandfara-

partafelagið óheft av øðrum virksemi Strandferðslunnar.

§ 2. Landsstýrinum er heimilað í samráð við figgjarnevndina at veðhalda fyri lánum, ið eru 30% av keypsvirðinum av einum ferðamanna- og farmaskipi, og at veðhalda fyri rakstrarláni upp til 10 mió. kr.
2. stk. Eisini er landsstýrinum heimilað úr landskassanum at læna felagnum neyðugan pening til umbygging av skipinum fyri at betra umstøður ferðafólksins. Lánið verður at renta við 4% og avdráttartíðin verður 17 ár, harav tvey tey fyrstu eru avdráttarfrí.

§ 3. Landsstýrinum er heimilað at læna neyðugan pening at lúka krøvini eftir §§ 1 og 2.

§ 4. Landsstýrið kann vegna almenna partapeningin gera ánarasáttmála um áhugamál partanna við partabrævaánara ella bólkar av partabrævaánarum í felagnum, tá hesir hava tilknýti til sjóflutningsvinnu.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

skip Landsins's øvrige virksomhed.

§ 2. I samråd med finansudvalget bemyndiges landsstyret til at garantere for lån på 30% af købsværdien af et passager- og fragtskib og at garantere for et driftslån på indtil 10 mio. kr.
Stk. 2. Endvidere bemyndiges landsstyret til at låne selskabet det nødvendige beløb til ombygning af skibet til forbedring af passagerfaciliteterne. Lånet ydes mod 4% i rente, og afdragstiden bliver 17 år, hvoraf de to første år er afdragsfri.

§ 3. Landsstyret bemyndiges til at optage nødvendige lån til at dække kravene i henhold til §§ 1 og 2.

§ 4. For dent offentlige aktiekapital kan landsstyret indgå ejeraftaler vedrørende parternes interesser med aktieejere eller sammenslutninger af aktieejere i selskabet under forudsætning af, at disse har tilknytning til søtransporterhvervet.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið um keyp av størri og meira hóskandi fari til siglingina hjá Smyrli er væl kent á tingi.

Hóast framlagdar eru nógvar prógvgrundir fyri, at Smyril ikki nøktar flutningstørvin á teimum rutum, hann røkir, og at størri skip kundi verið rikið fyri nærum sama kostnað sum Smyril, men við munandi størri inntøkum, so hevur ikki verið møguligt at fingið meiriluta fyri slikum keypi.

Nú skuldu kortini útlit verið fyri at fleiri tingmenn enn áður taka undir, ti nú er eyðsýniligt, at aðrir hava áhuga fyri at taka hesa sigling burtur úr føroyskum hondum.

Samstundis má hesin áhugi styrkja álitið til, at tað er skilagott at uppihalda hesi sigling Smyrils.

Nú ein av teim størru landsstýrisflokkunum -- sambært blaðskriving -- tvær ferðir í hesum ári hevur tikið undir við royndum at útvega størri skip til partar av rutuni og til útbygging av sigling á Norðsjóvarrutum, metir javnaðarflokkurin, at ein meirluti finst í tinginum fyri at hitt almenna í Føroyum tekur upp samvinnu við aðrar um sigling við helvtarbýti av partapeningi og fíggjarligari ábyrgd.

Helvtarbýtið, talan hevur verið um, var í sciinna umfari millum landskassan og tvey íslendsk skipafeløg, men javnaðarflokkurin heldur, at tað er rættari í fyrstu atløgu at fremja slíka helvtarsamvinnu við føroysk feløg ella einstaklingar í Føroyum, soleiðis at vit uenna okkum enn meira á hesum øki, áðrenn samvinna verður tikin upp við aðrar.

Fyri hesum talar, at:

1) Eitt føroyskt felag, ið rekur eitt størri skip enn Smyril í Norðuratlantshavi og møguliga Smyril í Norðsjóvarsigling, er gott støði undir samvinnu við onnur føroysk skipafeløg um viðari útbygging av ferju- og Ro-Ro sigling, so hvørt hesi skulu útvega sær nýggj flutningsamboð, soleiðis at hesi samsigla við »Smyrlarnar«.

2) »Norðurlandaskipið« kann náttúrliga fáast inn í myndina í hesum felag, ti tað er valla hugsandi, at Norðurlond taka fíggjarliga av slíkum skipi, uttan so at tað verður umsitið av einum felag, har tað almenna í hvussu er ikki er í minniluta.

3) Slíkt felag vil hava allar neyðugar fortreytir fyri at taka upp samvinnu við aðrar — eitt nú íslendingar — um eina útbygging av ferju og ferðamannasigling, ið ikki bert fevnir Íslandi, Føroyum og næstu grannalondum okkara, men eisini virkar aðrastaðni har tørvur er. Stutta roynd Smyrils á Norðsjóvarleiðum sýndi, at brúk er fyri rutum fleiri staðni, har eingin sigling er í løtuni.

Javnaðarflokkurin metir, at tað í longdini er óforsvarligt at halda fram á rutunum við verandi Smyrli, ti fíggjarliga úrslitið vil versna uttan kapasitetsøking og nógva trýstið vil fyrr ella seinni seta seg í rangastrupa Smyrils, og tá vit av hesum grundum noyðast at leggja hann, er møguliga so dýrt at útvega størri far, at føroyingar ikki fara undir tiltakið aftur.

Longu nú eru allar koyggjur bílagdar komandi summar, og er ti neyðugt at vísa viðskiftafólki til aðrar flutningsmøguleikar. Hetta er stórt samfelagsøkonomiskt spell. So átti ikki at verið, samstundis sum framvegis tørvur er á útbygging av alternativum møguleikum til teirra, fiskivinnan hevur at bjóða.

Vísandi til viðmerkingarnar í løgtingsmálunum nr. 61/1979 og nr. 21/1980 eins og

til álitini um Norðurlandaferju og nýggjan Smyril (Óli Hammer og N. Magnussen) mælir javnaðarflokkurin tinginum til nú at fremja hesa nýíløgu.

1. viðgerð 4. februar 1982. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 16. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av javnaðarflokkinum tann 23. november 1981 og undir 1. viðgerð tann 4. februar 1982 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Frederik Olsen, Óli Breckmann, Anfinn Kallsberg og Juul Jacobsen) setir einki uppskot fram, tá landsstýrið arbeiðir við málinum um rakstur av millumlanda ferðamanna- og farmasigling.

Minnilutin (Ove Mikkelsen og Atli Dam) taka undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Atli Dam viðmerkir at tað er av týdningi at heimild til keyp av nýggjum ferðamannaskipi fyriliggur so skjótt sum gjørligt, soleiðis at landsstýrið og Strandfaraskip Landsins hava neyðugar stundir at kanna skipamarknaðin og samráðast um keyp av jústi tí rætta skipinum til siglingina í 1983.

Ferðaætlanin fyri 1983 eigur at verða kunngjørd í seinasta lagi í september 1982 og skulu føroyingar kunna samráðast í álvara um keyp, ber ikki til at seljarin skal bíða eftir politiskari avgerð um keyp í langa tíð.

Heimildin eigur tí at fyriliggja og avgerðin viðvíkjandi tekniska støði skipsins latin í hendurnar á skipakønum monnum.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskotið § 1 fall við 12-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1800-48-1.

62. Fyrispurningur til Torbjørn Poulsen, landsstýrismann.

Ár 1981, mikudagin 25. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Vísa skjøl landsstýrisins, at Tryggingarsambandið Føroyar hevur fingið heimild til løgu í hotelfyritøku?

2. Um so er, á hvønn hátt ætlar landsstýrið at tryggja tryggjaran ímóti møguligum peningatapi?

3. Fyriliggur nakað úrslit av kanningararbeiðinum um trygging sambært lóg nr. 47 frá 7. juni 1979?

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956, ið avloysti fleiri kunngerðir frá fýratiárunum hevur Tryggingarsamband Føroya fingið einarætt at røkja tryggingarvirksemi í Føroyum, tá livstryggingin er undantikin.

Ein orsøkin til hesa lóggávu man vera han, at tryggingarpeningurin tá verður í landinum, eins væl og vit tá høvdu ávirkan á tryggingaruppháeddirnar, ið ikki er uttan týdning.

Somuleiðis má havast fyri eyga umsitingin av hesum stóru peningsupphæddum tryggingartakarans, at hesin verður nýttur á skilabesta hátt, soleiðis at hann kastar sum mest av sær tryggingartakarum til fyrimuns.

Hetta kundi tá, um rætt varð fyriskipað, tátma gjaldið hjá einstaklingum, skipum v.fl.

Tá Tryggingarsambandið Føroyar nú er farið undir bygging og rakstur av hotelvirksemi, ein vinna, ið lønarliga man verða ógvuliga ivasom, verður hesin spurningur settur landsstýrismanninum, ið umsitur hetta mál.

1. december varð samtykt við 29-0 atkvøðum, at fyrispurningurin skuldi svarast.

16. december svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður soleiðis

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 62/1981 hevur Asbjørn Joensen, løgtingsmaður 24. november 1981 sett mær hesar fyrispurningar:

1. Visa skjøl landsstýrisins, at Tryggingarsambandið Føroyar hevur fingið heimild til ilegu í hotelfyritøku?

2. Um so er, á hvønn hátt ætlar landsstýrið at tryggja tryggjaran ímóti møguligum peningatapi?

3. Fyriliggur nakað úrslit av kanningararbeiðinum um trygging sambært lóg nr. 47 frá 7. juni 1979?

ad fyrispurningunum 1 og 2:

Í umsókn frá p/f Hotel Føroyar dagfest 31. mars 1981 til Direktoratet for Egnsudvikling um studning og lán til bygging av hotelli í Tórshavn fyri 51 mió. kr. framgongur av skjølunum, at av A-partapeninginum uppá 3 mió. kr. hevði Tryggingarsambandið Føroyar teknað seg fyri 500.000 kr. og Føroya Brunatrygging fyri 500.000 kr. og av B-partapeninginum uppá 4.100.000 kr. 600.000 kr. hvør.

Málið snúði seg tá um, um landsstýrið gav umsóknini viðmæli og ikki um loyvi til tryggingina at seta partapening í hotelfyritøkuna, umsókn í so máta fyrilá ikki. Landsstýrið gav umsóknini viðmæli aftaná, at málið hevði verið til ummælis hjá Búskaparráðnum.

22. oktober 1981 søkir Tryggingarsambandið Føroyar um landsstýrisins góðkenning til, at høvuðsdeildin fær loyvi til at læna P/F Hotel Føroyar 3 mió. kr. Upplýst er, at lánið saman við tilsvarandi láni tilsamans 8 mió. kr. frá báðum bankunum verður veitt partafelagnum bert til tað eina endamálið at vera trygdarpeningur tey fyrstu 5 árini at rinda rentu og avdrátt av øðrum lánum, um felagið ikki er ført fyri at rinda hesi avgjøld yvir raksturin. Føroya Brunatrygging og Føroya Vanlukkutrygging yvirtaka nærri tilskilaðan part av láninum, tá ið tryggingarveðhald er fingið. Nevndirnar í umrøddu 3 deildum og umboðsráðið hava góðkent lánsveitingina.

Upplýst var eisini, at tryggingin søkir sær tryggingarveðhald fyri lánið, at tær 8 mió. kr. frá báðum bankunum í aktuellu støðuni verða at nýta fyrst og áðrenn sett verður á tær 3 mió. kr. frá tryggingini og at lánið frá tryggingini fær prioritet í hotelfelagnum áðrenn bankalánið 8 mió. kr.

Í skrivi 6. november 1981 átalar landsstýrið, at tryggingin leggur málið so seint fyri, at landsstýrið kennir seg bundið í støðutakanini — at taka støðu í einum máli, sum longu er avgjørt ella hat ikki vendist aftur.

Hevði landsstýrið kent seg óbundið í støðutakanini, hevði landsstýrið ikki gingið umsóknini á møti. Sum málið lá fyri, setti landsstýrið seg tó ikki móti lánsveitingini,

tó undir teimum treytum, ið nevndar eru frammanfyri, at tryggingin søkt sær tryggingarveðhald o.s.fr.

ad fyrispurning 3:

Millumtinganevndin í løgtingsmáli nr. 54/1978 (vetrarting) um kanning av tryggingarviðurskiftunum framlegði í løgtingsmáli nr. 106/79 álit við fylgjandi uppskotum til samtyktar:

I Álagt verður landsstýrinum at gera uppskot til lógarbroytingar, ið nevndar eru frammanfyri í viðmerkingunum og leggja uppskot fyri tingið komandi tingsetu.

II Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við Tryggingarsambandið um at avtaka regluna um, at bilar bert verða tryggjaðir fyri 75% av virðinum.

Viðvíkjandi fylgjandi spurningum, ið eru umrøddir í álitinum, er at siga:

6-tíma reglan í samband við rúsdrekkakoyring. Landsstýrið hevur lagt uppskot fyri løgtingið um at seta tílíka reglu í gildi.

Nýggj brandlóg. Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at tilevna lógaruppskot.

Reglugerð fyri eftirlitið og reglu um val og valskeið hjá umboðsráð og nevndum. Uppskot til reglugerð er tilevnað og lagt fyri umboðsráðið.

Viðvíkjandi teimum spurningum, ið eftir standa, vil landsstýrið taka upp samráðingar skjótast tilber.

F.L.j.nr. 1410-12

---

63. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Ár 1981, mikudagin 25. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Vilhelm Johannesen, løgtingsmanni soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Nær kunnu vit rokna við, at serlæknarnir á landssjúkrahúsinum fara at veita regluliga konsulenttænastu á lokalsjúkrahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri?

Viðmerkingar:

Í seinasta landsstýri høvdu vit eina ætlan um, at serlæknarnir á landssjúkrahúsinum regluliga skuldu veita konsulenttænastu á Suðuroyar- og Norðoya sjúkrahúsi.

Ætlanin var at fáa til vega hóskandi viðtalubølir á báðum lokalsjúkrahúsunum til endamálið. Í Klaksvík var ætlanin at taka ein part av starvsfólkahúsinum til hesa nýtslu og at fara undir neyðugar broytingar av hesum partinum av bygginginum so skjótt, hann var tøkur. Mær kunnugt hevur hesin parturin av starvsfólkahúsinum nú verið tøkur í fleiri mánaðir. Men onki er hent kortini.

Tað er mangan trupult, serliga á vetradegi, bæði hjá eldri fólki og hjá foreldrum við børnum, at skula reisa til Havnar fyri at hitta ein serlækna. Tí hevur tað stóran týdning fyri fólk, bæði í Suðuroy og í Norðoyggjum og fyri ein part eisini í Eysturoynni, at konsulenttænastan hjá serlæknunum á landssjúkrahúsinum við reguligum viðtalum á teimum báðum lokalsjúkrahúsunum kemur at virka sum skjótast.

1. december varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

19. januar 1982 svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis:

Reglugrundarlagið fyri konsulenttænastu hjá yvirlæknum er staðfest í »Aftale om klassificering af og særlige ansættelsesvilkår for tjenestemandsansatte overlæger ved amtskommunale sygehuse m.v.«. Í § 3 er arbeiðsøkið umtalað og 1. petti, pkt. 4 er soljóðandi:

»Bistand inden for samme fagområde til amtskommunernes øvrige sygehuse.

Bistand kan normalt kun pålægges afdelinger med mindst 2 overlæger og kun i en udstrækning, der er forenelig med en forsvarlig betjening av hovedarbejdsstedet.

Bistand kan maksimalt pålægges 2 gange om ugen pr. overlæge og skal skema lægges mandag - fredag inden for tidsrummet kl. 8 - 15 (inkl. rejsetid). Parterne kan i det enkelte tilfælde aftale en anden tidsmæssig ramme for bistandsforpligtelsen«.

Ígjøgnum fleiri ár hava yvirlæknarnir á heiliráðdeildini og røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum veitt tænastu til sjúkrahúsini í Klaksvík og á Tvøroyri 14. hvønn dag. Yvirlæknin í kirurgi á Klaksvíkar sjúkrahúsi hevur ígjøgnum nøkur ár veitt ortopædkirurgiska konsulenttænastu á Landssjúkrahúsinum eina ferð um vikuna. Harafturat er narkosuyvirlæknin á Landssjúkrahúsinum av og á á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Medisinska tænastan á Klaksvíkar sjúkrahúsi er steðgað í november 1981 orsakað av setan av einum medisinskum yvirlækna.

Mett verður, at spurningurin snýr seg um tænasturna hjá oyrna- og eygna-

læknanum. Teir eru báðir einsamallir yvirlæknar og kunnu sostatt ikki áleggjast konsulenttænastu.

Teirra møguliga tænasta í Klaksvík og á Tvøroyri má býtast í tvey:

1. Konsulenttænasta, t.v.s. at teir føstu læknarnir á staðnum fáa ráð og vegleiðing viðvíkjandi viðgerð av innlagdum sjúklingum.
2. Privat viðtala, t.v.s. ávistir sjúklingar fáa kanning og viðgerð. Hetta er ikki ein sjúkrahúsuppgáva.

Tann fyrra tænastan er ikki tíðarkrevjandi, orsakað av at talið á sjúklingum er lítið.

Tann størsta týdning fyri íbúgvarnar í Norðoyggjum og í Suðuroy hevur pkt. 2.

Sum umtalað omanfyri, kann ikki áleggjast einsamøllum yvirlækna at veita konsulenttænastu, uttan so at viðkomandi hevur játtað hesum.

Í løtuni er støðan tann, at Petur Ellefsen, yvirlækni í háls-, nasa- og oyrnasjúkum hevur játtað at fara til Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Tænastan á Suðuroyar sjúkrahúsi byrjaði í september 1981, 14. hvønn dag.

Innkeyp av tólum v.m. er somuleiðis framd á Klaksvíkar sjúkrahúsi, men fer har í løtuni fram flytan í samband við at medsinskur yvirlækni er settur, og kann høli ikki útvegast fyrr enn hetta arbeiðið er liðugt.

Tænastan hjá yvirlæknanum í eygnasjúkum er ikki byrjað enn, men samráðingar fara fram hesum viðvíkjandi, og roknað verður við, at eitt úrslit spyrst burturúr í byrjanini av 1982.

64. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Ár 1981, týsdagin 15. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9 verður sum nýtt 8 sett:

»hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, neyðugar útreiðslur í sambond við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í a) - g).

a) Útreiðslur til ferðing við bili millum bústað og arbeiðsstað, har fjarstøðan er 7 km ella meira, verða loyvdar frádrignar við ávísari upphædd fyri hvønn koyrdan km sbrt. g).

b) Kann almenn ferðsla verða nýtt í staðin, verður frádráttur loyvdur ájavnt við ferðakostnaðin við almenna rutusambandinum.

c) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað sjóvegis verður frádráttur loyvdur ájavnt við útreiðslur, men tó ongantíð meir enn svarandi til ferðakostnaðin við almennum rutusambandi.

d) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað uttanlands verður

§ *1.* I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 9 indsættes som nyt 8:

»hos en person, der har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri, nødvendige udgifter i forbindelse med transport mellem bopæl og arbejdssted efter reglerne i a) - g).

a) Udgifter til transport med bil mellem bopæl og arbejdssted, når afstanden er 7 km eller mere, tillades fratrukket med et bestemt beløb for hver kørt km jfr. g).

b) Såfremt offentlig transport kan benyttes, tillades fradrag af samme størrelse som transportudgiften ved offentlig transport.

c) For søvejs transport mellem bopæl og arbejdssted tillades fradrag af samme størrelse som udgiften, dog aldrig mere end transportudgiften ved offentlig ruteforbindelse.

d) For transport mellem bopæl og arbejdssted udenlands tillades fra-

frádráttur loyvdur sambært skjalprógvaðar útreiðslur.

e) Giftur persónur, sum flytir í aðra kommunu fyri at arbeiða har, fær frádrátt fyri dupult húsarhald, soleiðis at loyvdur verður ein ávísur mánaðarligur frádráttur fyri leigu av høli og ein ávísur frádráttur um dagin fyri meirútreiðslur til kost sbrt. g).

f) Persóni, sum við loyvi frá landsstýrinum hevur útvegað sær avlamisakfar eftir reglunum í løgtingslóg um innflutningsgjald, og sum nýtir avlamisakfarið í samband við egnu ferðing millum framt frádráttirnar í a) - c) loyvdur ein fastur frádráttur uppá 6.000,- kr. um árið, tó í mesta lagi ájavnt við lønarinntøkuna. Frá og og við 1. oktober 1982 verður frádrátturin pristalsviðgjørdur við pristalinum pr. 1. oktober 1981 sett til 100.

g) Útreiðslur sambært reglurnar í a) - e) verða tó bert loyvdar frádrignar í tann mun samlaða upphæddin fer upp um eina ávisa upphædd. Henda upphæddin verður ásett av líkningaráðnum eins og tær í a) og c) nevndu føstu upphæddir í seinasta lagi 1. oktober sum galdandi fyri komandi skattaár.«

2) § 14, nr. 3 a, 2. punktum verður orðað soleiðis:
»Giftur persónur, sum hevur húski sítt í Føroyum, kemur ikki undir hesa reglu, men er skattskyldugur í Føroyum.«

3) § 28, 5. stk. verður »landsstýrið«

drag i henhold til dokumenterede udgifter.

c) En gift person, der flytter i anden kommune for at arbejde der, kan fratrække for dobbelt husførelse, således at der tillades et bestemt månedligt fradrag for leje af rum og bestemt fradrag om dagen for merudgifterne til kost jfr. g).

f) En person, der med landsstyrets tilladelse har erhvervet sig en invalidebil efter reglerne i lagtingslov om indførselsafgift, og som benytter invalidebilen i forbindelse med egen transport mellem bopæl og arbejdssted, tillades udover fradragene a) - e) et fast fradrag på 6.000 kr. om året, dog højst så meget, som svarer til lønindtægten. Fra og med 1. oktober 1982 bliver fradraget pristalsreguleret med pristallet pr. 1. oktober 1981 sat til 100.

g) Udgifterne efter reglerne a) - e) tillades kun fratrukket, den del af de samlede udgifter overstiger et nærmere bestemt beløb. Dette beløb fastsættes at ligningsrådet og ligeledes de i a) og e) omhandlede faste beløb senest 1. oktober gældende for det kommende skatteår.«

2) § 14, nr. 3 a, 2. punktum formuleres således:
»En gift person, der har sit hustand på Færøerne, kommer ikke under denne bestemmelse, men er skattepligtig på Færøerne.«

3) I § 28, stk. 5, ændr. »landsstyr[illegible]«

broyt til »líkningarráðið«.

4) Í § 44, 1. stk., 1. punktum gongur út: »og tann álíknaða kommunuskattin«.

5) § 53, 1. stk. Skoytt verður uppí;
»Hevur persónur rentufrádrátt smb. § 33, 2. stk. í tí persónliga kommunuskattinum í tilhalds- ella heimakommununi, og vísir hesin kommunuskattur hall, aftan á at reglan í § 33, 2. stk. um flyting millum hjúnafelagar er nýtt, kann hetta hall verða drigið frá í kommunuskattinum í atvinnukommununi. Um eisini tá verður hall, kann hetta verða drigið frá í kommunuskattinum árið eftir, soleiðis at fyrst verður frádráttur loyvdur í kommunuskattinum til tilhalds- ella heimakommununi. Um tá verður hall, kann frádráttur verða loyvdur í tí kommunuskattinum, sum skal gjaldast til atvinnukommununa smbr. regluna í § 9, 7).«

6) § 71, 1. stk. verður orðað soleiðis:
Til álikningina og útrokningina av skattinum skulu, uttan at biðið verður um tað, á hvørjum ári innan 31. januar hesar upplýsingar verða latnar kommunala líkningarvaldinum í heimstaðarkommununi:

1) Øll, sum árið fyri hava útgoldið ella góðskrivað løn, gratiale, provisión o.l. í virki sínum, skulu upplýsa samanlagda upphædd av útgjaldingini ella tí, ið góðskrivað er. Harafturat skal vera uppgivið samanlagt, hvussu nógv hvør einstakur hevur vunnið, navn hansara, føðingardagur, bústaður og heim-

»ligningsrådet«.

4) § 44, stk. 1, 1. punktum udgår følgende: »samt størrelsen af den pålignede kommuneskat«.

5) I § 53, stk. 1 tilføjes:
»Såfremt en person har rentefradrag i henhold til § 33, stk. 2 i den personlige kommuneskat i opholds- eller hjemstedskommunen, og denne kommuneskat bliver negativ, efter at bestemmelsen i § 33, stk. 2 om overførsel mellem ægtefæller er anvendt, kan dette negative resultat fratrækkes i kommuneskatten i erhvervskommunen. Såfremt resultatet herefter også bliver negativt, kan dette fratrækkes i kommuneskatten det følgende år, således at fradrag først tillades i kommuneskatten i opholds- eller hjemstedskommunen. Såfremt resultatet stadig er negativt, kan fradrag tillades den kommuneskat, som skal betales i erhvervskommunen efter reglerne i § 9, 7).«

6) § 71, stk. 1 affates således:
Til brug ved skatteligningen og skatteberegningen skal der hvert år inden 31. januar uden opfordring gives følgende oplysninger til den kommunale ligningsmyndighed i bopælskommunen:

1) Enhver, der i det foregående år i sin virksomhed har udbetalt eller godskrevet lønning, gratiale, provision o.lign. skal oplyse størrelsen af den samlede udbetaling eller godskrivning af sådanne beløb. Endvidere skal der gives oplysning om det samlede beløb, der er indtjent af hver enkelt modtager, modtagerens

staðarkommuna og aðrar upplýsingar, ið møguliga eru neyðugar fyri at sanna, hvør móttakarin er. Sama skylda er eisini viðvikjandi at lata upplýsing um samsýning, ið latin er sum endurgjald fyri útreiðslur, t.d. endurgjald fyri ferðaútreiðslur, flutning og umboðan, uttan so at hesar koma undir regluna í § 4 í hesari lóg. Sama skylda er eisini viðvíkjandi at lata upplýsing um ókeypis nýtslu av fastogn ella leysafæ o.t., sum er skattskyldugt samanbært § 2, nr. 4. Verður lønin goldin við millummanni, fellur skyldan á hann, um arbeiðsgevarin er ikki førur fyri at geva upplýsingina.

2) Øll, sum árið fyri hava útgoldið ella góðskrivað samsýning til rithøvunda ella tónaskald, samsýning til listamenn, samsýning fyri fyrilestur o.l. skulu upplýsa samlaðu upphædd av útgjaldingini ella ti, ið góðskrivað er. Harafturat skal verða upplýst, hvussu nógv hvør einstakur hevur vunnið samanlagt. Herumframt skal verða upplýst navn á móttakara, føðingardag, bústað og heimstaðarkommuna og aðrar upplýsingar, sum møguliga eru neyðugar fyri at sanna, hvør móttakarin er. Somu skyldu at lata upplýsing hevur hann, sum hevur útgoldið avgjald fyri patentrætt, mynstur, vørumerki o.l., óansæð um avgjaldið verður goldið so við og við ella við ávisari upphædd einaferð við alla. Reglurnar undir 1) 5. punktum verða samsvarandi nýttar.

navn, fødselsdato, bopæl og bopæls kommune samt eventuelle andre oplysninger, der er nødvendige til identifikation af modtageren. Pligten omfatter også beløb, der ydes som godtgørelse for afholdte udgifter, f.eks. godtgørelse for rejser, befordring og repræsentation medmindre beløbet falder ind under § 4 i denne lov. Pligten omfatter også oplysninger om vederlagsfri brug af fast eller rørlig ejendom o.lign., som er skattepligtig jfr. § 2 nr. 4 i denne lov. Udbetales lønnen m.v. gennem mellemmand, påhviler pligten dog denne, hvis arbejdsgiveren er ude af stand til at give oplysningerne.

2) Enhver, der i det foregående år har foretaget udbetaling eller godskrivning af forfatter- eller komponisthonorarer, honorarer til udøvende kunstnere, honorarer for foredrag o.lign. skal oplyse størrelsen af den samlede udbetaling eller godskrivning af sådanne beløb. Endvidere skal der gives oplysning om det samlede beløb, der er indtjent af hver enkelt modtager. Desuden skal der gives oplysning om modtagerens navn, fødselsdato, bopæl og bopælskommune samt eventuelle andre oplysninger, der er nødvendige til identifikation af modtageren. Samme oplysningspligt påhviler den, der har foretaget udbetaling af afgift for udnyttelse af patentrettigheder, mønster, varemærke o.lign. hvad enten afgiften erlægges som en løbende ydelse eller som en sum én gang for alle.

3) Øll, sum árið fyri hava útgoldið ella góðskrivað samsýningar av tílikum slag, sum nevndar eru undir litra a) ella e) skulu upplýsa samanlagda upphædd av útgjaldingini ella ti, ið góðskrivað er. Harafturat skal verða uppgivið samanlagt, hvussu nógv hvør einstakur hevur vunnið, navn hansara, føðingardagur, bústaður og heimstaðarkommuna og aðrar upplýsingar, ið møguliga eru neyðugar fyri at sanna, hvør móttakarin er.

a) Samsýning fyri at vera limur í ella sum hjálparfólk hjá stjórn, nevnd, umboð, ráð o.l.

b) Eftirløn, biðipening og líknandi skattskyldugar veitingar.

c) Fólkapensjón, avlamispensjón og aðrar skattskyldugar sosialar veitingar. Arbeiðsloysisstuðning, streiku-, og lockoutsamsýningar, dagpengar og sjúkaløn.

d) Studningur og aðrar líknandi samsýningar, ið eru skattskyldugar, og sum verða goldnar av almennum myndugleika ella stovni ella úr almennum ella privatum grunnum, legatum o.l.

e) Skattskyldugar útgjaldingar samhært løgtingslóg um skatt av rentutrygging v.m.

Reglerne under litra 1) 5. punktum finder tilsvarende anvendelse.

3) Enhver, der i det foregående år har udbetalt eller godskrevet beløb, som omfattes af de under litra a) til e) nævnte indtægtsarter skal oplyse størrelsen af den samlede udbetaling eller godskrivning af sådanne beløb. Endvidere skal der gives oplysning om det samlede beløb, der er indtjent af hver enkelt modtager, modtagerens navn, fødselsdato, bopæl og bopælskommune samt eventuelle andre oplysninger, der er nødvendige til identifikation af modtageren.

a) Godtgørelse for medlemskab af eller som medhjælp for bestyrelser, udvalg, kommissioner, råd og lignende.

b) Pension og ventepenge samt lignende skattepligtige ydelser.

c) Folkepension, invalidepension og andre skattepligtige sociale ydelser. Arbejdsløshedsunderstøttelse, strejke- og lockoutgodtgørelser, dagpenge og sygeløn.

d) Understøttelser og andre lignende ydelser af skattepligtig art, der udredes af offentlige myndigheder eller institutioner eller af offentlige eller private fonds, legater eller lignende.

e) Indkomstskattepligtige udbetalinger som nævnt i lagtingslov om skat af renteforsikring m.v.

4) Hann, ið fær inntøkuna, skal geva honum, ið hevur skyldu at lata upplýsing eftir 1) upplýsing um navn, føðingardag, bústað og heimstaðarkommunu og møguligar aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at sannu, hvør hann er, ið fær inntøkuna.

4) Indkomstmodtageren skal give den oplysningspligtige efter 1) oplysning om navn, fødselsdato, bopæl og bopælskommune samt eventuelle andre oplysninger, der er nødvendige til identifikation af indkomstmodtageren.

5) Heldur ein av teimum í 1) nevndu, sum hevur skyldu at lata upplýsing, uppat við virki sínum, og hevur hann útgoldið ella góðskrivað tey í 1) nevndu sløg av inntøkum, skal hann innan 10 dagar aftaná seinastu útgjalding av tílíkari inntøku geva upp sum í 1) nevnt fyri tíðarskeiðið frá byrjan av álmanakkaárinum.

5) Ophører en af de i 1) nævnte oplysningspligtige med at drive virksomhed, som har medført udbetaling eller godskrivning af de i 1) nævnte indkomstarter, skal der senest 10 dage efter sidste udbetaling af sådan indkomst gives oplysning som nævnt i 1) omfattende tiden fra kalenderårets begyndelse.

6) Persónur, ið fær inntøkuna, skal fáa avrit av upplýsingum, sum eftir omanfyristandandi reglum eru latnir um hann. Líkningarráðið kann døma hann, ið vanrøkir hesa skyldu, í sekt upp til 5.000,- kr.

6) Indkomstmodtageren skal have kopi af de i henhold til ovenstående regler afgivne oplysninger vedrørende ham. For oversiddelse af denne pligt kan der af ligningsrådet ikendes den pågældende en bøde af indtil kr. 5.000,-.

7) Sum nýggj § 91, 2. stk. verður sett:
»*2. stk.* Skattur, sum er goldin øðrum riki av inntøku haðani, har avtala smbrt. 1. stk. ikki er gjørd, antin skatturin er beinleiðis álíknaður ella afturhildin, kann verða drigin frá í tí inntøkuskatti, sum latin skal verða í Føroyum av hesari inntøku. Frádrigið kann tó ikki verða meira enn tuttalsliga fellur á ta í øðrum riki skattaðu inntøkuna, sum eisini er skattað í Føroyum.«

7) Som nyt stk. 2 til § 91 indsættes:
»**Stk. 2.** Skat, som er betalt til fremmed stat, hvormed ingen aftale jfr. stk. 1 foreligger, af indkomst stammende fra denne stat, enten ved direkte pålignin, eller ved indeholdelse kan fradrages i den indkomstskat, som skal tilsvares på Færøerne af denne indkomst. Fradraget kan dog ikke være større end den skat som forholdsmæssig falder på den i den fremmede stat beskattede indkomst, der er pålignet på Færøerne.«

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1982/83.

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1982/83.

Viðmerkingar:

Landsstýrið arbeiðir við eini nýggjari skattalóg, sum skal koma í staðin fyri løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt. Til henda lóg kemur í gildi, verður neyðugt at gera smærri broytingar í núgaldandi skattalóg, og verður uppskot hervið lagt fyri tingið samsvarandi.

Broytingarnar eru hesar:

I. Við teirri broyting av skattalógini, sum framd varð í 1978, galdandi fyri skattaárið 1979/80, fall tann umsitingarliga regla burtur, sum loyvdi frádrátt í sjálvuppgávuna fyri útreiðslur av flutningi millum bústað og arbeiðsplass. Mælt verður til, at henda regla kemur aftur at galda og sett í skattalógina. Serlig regla verður at galda fyri avlamisakfør.

Mælt verður til at loyva frádrátt fyri dupult húsarhald.

II. Sambæri galdandi skattareglur er maður, sum flytir til Grønlands við húski sínum ikki skattskyldugur í Føroyum, um uppihaldið í Grønlandi varar í meira enn 2 ár. Flytir húskið síðani aftur til Føroya, meðan t.d. maðurin verður verðandi í Grønlandi, verður hert húskið sett í skatt í Føroyum, meðan maðurin verður verandi skattskyldugur í Grønlandi.

Fer hinvegin maður til Grønlands at arbeiða, meðan húskið er eftir í Føroyum, er hann fult skattskyldugur í Føroyum uttan mun til, hvussu leingi hann er í Grønlandi.

Fyri at javnstilla hesar báðar bólkar, verður skotið upp at broyta lógina soleiðis, at uttan mun til undir hvørjum umstøðum maður flytir til Grønlands, verður skattskyldan staðfest aftur í Føroyum hjá honum, um familjan flytir aftur til Føroya at búgva, sjálvt um tey hava uppihildið sær í Grønlandi í meira enn 2 ár.

III. Í samband við, at likningarráðið hevur heimild at taka støðu til spurningar, hvussu skattur hjá ávísum persóni skal býtast millum tvær ella fleiri kommunur, verður skotið upp, at likningarráðið somuleiðis fær avgerðarrættin í málum, sum fella undir umrøddu lógarreglu.

IV. Sambært galdandi lóg skal kommunala likningarvaldið leggja fram til alment eftirlit lista yvir endaligu útkomnu inntøku og álíknaðan kommunuskatt fyri hvønn skattgjaldara. Mælt verður til at framløgulistin ikki kemur at innihalda upplýsingar um álíknaða kommunuskattin.

V. Sambært núverandi reglur fyri, hvussu skatturin verður býttur millum tvær

kommunur, tá ið ein persónur hevur atvinnu í aðrari kommunu enn tilhalds- ella heimakommununi, kann tann privati rentufrádráttur in ikki nýtast sum frádráttur í kommunuskattinum í atvinnukommununi.

Ætlanin við broytingini er at lata ein skattskyldugan persón fáa fullan frádrátt fyri privatar rentur, uttan mun til í hvørjari kommunu hann ávíkavist hevur atvinnu og tilhalds- ella heimstað. Reglan er ikki galdandi fyri persónar búsitandi uttanlands, og sum reka vinnu í Føroyum.

Sambært galdandi lóg skulu øll, sum hava lønað fólk í virki sínum, lata kommunala likningarvaldinum fullfiggjað yvirlit yvir útreiðslur til lønir o.t. við tilskilan av navni og bústaði lønarmóttakarans. Hildið verður neyðugt at gera hesar reglur greiðari og tilskila, at umframt lønir verða allar samsýningar, gratialir, ómakaløn o.m.a. annaðhvørt hesar eru útgoldnar ella góðskrivaðar at lata likningarvaldinum.

VI. Tað kemur fyri, at føroyingar arbeiða uttanlands ella fara umborð á útlendsk fiski- ella farmaskip, og har koma at gjalda skatt, uttan at skattskyldan í Føroyum heldur uppat av teirri orsøk. Fyri at umganga eina dupultskatting í tílíkum føri, verður skotið upp, at ein almenn kreditregla verður sett inn í føroysku skattalógina viðvíkjandi skatti goldnum uttanlands.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.
ad § 9, pkt. 8, a):

Frádráttur fyri hvønn koyrdan km er bert loyvdur, har fjarstøðan er fullir 7 km ella meira millum bústað og arbeiðsstað. Fridrátturin er bert loyvdur fyri eina ferð aftur og fram dagliga.

ad § 0, pkt. 8,b):

Frádrátturin verður ásettur eftir ferðaseðlaprísinum á hægsta avsláttarstigi, t.d. eftir prísinum á mánaðarkorti. Hetta er eisini galdandi fyri ásetingarnar í § 9, pkt. 8, c) og d).

Kann almenn ferðsla bert nýtast ein part av ferðatíðini, verður frádrátturin roknaður eftir ferðakostnaðinum, har almenna rutusambandið kann nýtast. Reglurnar í § 9, pkt. 8,a) verða so nýttar fyri hin partin av ferðaleiðini. Hetta er tó framvegis treytað av, at samlaða fjarstøðan millum bústað og arbeiðsstað er 7 km ella meira.

ad § 9, pkt. 8,e):

Frádrátturin fyri leigu av høli verður treytaður av upplýsingum um leigutíðina og navn og bústað útleigarans.

ad § 0, pkt. 8,g):

Tær upphæddir, ið likningarráðið eftir reglunum í § 9, pkt. 8 a) og e) skal áseta

fyri skattaárið 1982/83, skulu kunngerast í seinasta lagi ein mánað eftir, at hesar lógarreglur eru samtyktar.

Eftir reglunum í hesi grein kann frádrátturin fyri ferðing eftir § 9 pkt. 8,a) og c) bert frádragast við teirri upphædd, sum samlaði kostnaðurin fer upp um eina ávisa minstu upphædd. Henda minsta upphædd fyri skattaárið 1982/83 er ætlað ásett til 1.500,- kr. fyri árið. Upphæddin verður so fyri eftirfylgjandi skattaár ásett av líkningarráðnum, soleiðis at upphæddin framyvir kemur at fylgja broytingunum í ferðakostnað, ferðaseðlaprísi v.m.

ad § 14, nr. 3 a:

Samb. galdandi skattareglur er maður, sum flytir til Grønlands við húski sínum ikki skattskyldugur í Føroyum, um uppihaldið í Grønlandi varar í meira enn 2 ár. Flytir húskið síðani aftur til Føroyar, meðan t.d. maðurin verður verandi í Grønlandi, verður hert húskið sett í skatt í Føroyum, meðan maðurin verður verandi skattskyldugur í Grønlandi.

Fer hinvegin maður til Grønlands at arbeiða, meðan húskið er eftir í Føroyum, er hann fult skattskyldugur í Føroyum uttan mun til, hvussu leingi hann er í Grønlandi.

Fyri at javnstilla hesar báðar bólkar, verður skotið upp at broyta lógina soleiðis, at uttan mun til undir hvørjum umstøðum maður flytir til Grønlands, verður skattskyldan staðfest aftur í Føroyum hjá honum, um familjan flytir aftur til Føroya at búgva, sjálvt um tey hava uppihildið sær í Grønlandi í meira enn 2 ár.

Skattsetingin í Føroyum verður í tílíkum førum aftaná heimflytingina gjørd samb. reglurnar fyri tilflytarar úr útlondum, soleiðis sum tilskilað er í § 19 í skattalógini.

ad § 28, 5. stk.:

Í samband við, at líkningarráðið hevur heimildina eftir § 48 í skattalógini at taka støðu til spurningar, hvussu skattur hjá ávísum persóni skal býtast millum tvær ella fleiri kommunur, verður skotið upp, at líkningarráðið somuleiðis fær avgerðarrættin í málum, sum fella undir umrøddu lógarreglu.

ad § 44, 1. stk.:

Skotið verður upp, at framløgulistin framyvir ikki kemur at innihalda upplýsingar um álíknaðan kommunuskatt, soleiðis sum praksis eisini hevur verið undanfarnu skattaár. Orsøkin til hesa broyting er, at í flest øllum førum vil skattalistin, um álíknaður kommunuskattur verður vístur, geva óbeinleiðis upplýsingar um rentuútreiðslurnar hjá ti einstaka skattgjaldaranum.

ad § 51, 1. stk.:

Sambært núverandi reglur fyri, hvussu skatturin verður býttur millum tvær kommunur, tá ið ein persónur hevur atvinnu í aðrari kommunu enn tilhalds- ella

heimakommununi, so kann tann privati rentufrádrátturin ikki nýtast sum frádráttur í kommunuskattinum í atvinnukommununi. Hetta hevur havt tær fylgjur, at ein persónur við privatum rentum ofta kann koma at gjalda kommunuskatt í atvinnukommununi, sum er munandi størri enn tann skattur vildi verið, um hann hevði heimstað í atvinnukommununi, tá ið eitt møguligt rentuhall ikki kann førast yvir á skattin í atvinnukommununi. Í mongum førum kann hetta geva monnum eina figgjarliga byrðu, sum er bæði tung og órímlig. Atvinnukommunun vildi ikki fingið meira skatt av tí, at maðurin hevur heimstað sín her, tí so kundi hann drigið renturnar frá í skattinum. Meiningin við broytingini er at lata ein skattskyldugan persón fáa fullan frádrátt fyri privatar rentur, uttan mun til í hvørjari kommunu hann ávíkavist hevur atvinnu og tilhalds- ella heimstað. Reglan er ikki galdandi fyri persónar búsitandi uttanlands og sum reka vinnu í Føroyum.

Ad § 71, 1. stk.

Tær uppskotnu broytingarnar til hesa lógarreglu eru í støran mun ein útgreining av galdandi upplýsingarskyldu hjá arbeiðsgevarum at lata inn á hvørjum ári upplýsingar um útgoldnar lønir og samsýningar v.m. Harumframt innihalda tær uppskotnu reglurnar eina útgreining av skylduni hjá øðrum á sama hátt at lata inn upplýsingar uttan áheitan um útgoldnar skattskyldugar lønir, samsýningar, veitingar o.tl.

Ad § 91, 2. stk.

Tað kemur fyri og vil uttan iva framyvir eisini í størri mun fyrikoma, at føroyingar arbeiða uttanlands ella fara umborð á útlendsk fiski- ella farmaskip og har koma at gjalda skatt, uttan at skattskyldan í Føroyum heldur uppat av teirri orsøk. Fyri at umganga eina dupultskatting í tílíkum føri, verður skotið upp, at ein almenn kreditregla verður sett inn í føroysku skattalógina viðvíkjandi skatti goldnum uttanlands.

1. viðgerð 19. januar. Málið varð beint í skattanevndina, sum 22. januar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fyri tingið av landsstýrinum 15. december 1981 og varð undir 1. viðgerð tann 19. januar 1982 beint í skattanevndina.

Broytingarnar, sum talan er um at gera sambært uppskoti landsstýrisins, eru hesar:

1. Umsitingarliga reglan um frádrátt í sjálvuppgávuni fyri útreiðslur, ið standast av

flutningi millum bústað og arbeiðspláss og reglan um dupult húsarhald, sum fullu burtur við broytingunum í 1978, koma aftur í gildi og verða at seta í skattalógina.

2. Uttan mun til undir hvørjum umstøðum maður flytir til Grønlands at arbeiða, verður skattskyldan hjá honum staðfest aftur í Føroyum, um familjan flytir aftur til Føroya at búgva, sjálvt um tey hava uppihildið sær í Grønlandi í meira enn 2 ár.
3. § 28, 5. stk. verður broytt soleiðis, at líkningarráðið heldur enn landsstýrið fær avgerðarrættin í málum, sum fella undir hesa grein.
4. Skuttalistin, sum kommunala líkningarvaldið leggur fram til alment eftirlit, kemur ikki at innihalda upplýsingar um áliknaðan kommunuskatt.
5. Allir skattskyldugir persónar, skulu fáa fullan frádrátt fyri privatar rentur, uttan mun til í hvørjari kommunu hann ávíkavist hevur atvinnu og tilhalds- ella heimstað.
6. Her er talan um eina útgreinan av galdandi upplýsingarskyldu hjá arbeiðsgevarum at láta inn á hvørjum ári upplýsingar um útgoldnar lønir og samsýningar v.m, og hjá øðrum at láta inn upplýsingar uttan áheitan um útgoldnar skattskyldugar lønir, samsýningar, veitingar o.t.
7. Ein almenn kreditregla verður at sela í skattalógina viðvíkjandi skatti, goldin uttanlands fyri at umganga eina dupultskatting fyri føroyingar, sum arbeiða uttanlands ella fara umborð á útlendsk skip.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó mælir ein samd nevnd til, at pkt. 3 og 4 í uppskotinum, sum eru ávíkavist § 28, 5. stk. og § 44, 1. stk. í skattalógini, verða óbroytt.

Sagt skal verða frá, at skattanevndin í samband við hetta løglingsmál hevur fingið skriv frá Føroya Fiskimannafelag, dagfest 20. í hesum, sum er viðlagt.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) førir fram:

Í 1978 samtykti løgtingið lýðandi broytingar í skattalógini, sum m.a. høvdu við sær, at teir flestu frádráttirnir vórðu tiknir burtur úr, og í staðin fingu allir løntakarar, útróðrarmenn og fiskimenn ein løntakarafrádrátt, ið saman við einum broyttum skattastiga vigaði upp ímóti teimum frádráttum, sum tein ávísu bólkarnir høvdu havt frammanundan. Eitt høvuðsendamál við skattalógarbroytingini í 1978 var at gera sjálvuppgávuna og skattaálíkningina einfaldari við tí fyri eyga, at vit seinni skuldu hava eina kelduskattaskipan, ið varð løtt at liva undir hjá tí vanliga skattgjaldaranum, og sum varð løtt, einføld og ódýr at umsita. Hetta uppskotið ber prógv um, at sitandi landsstýrissamgonga nú er sinnað at geva ávísum bólkum frádráttarfyrimunirnar aftur, við at loyva frádrátti fyri ferðing og fyri dupult húsarhald.

Minnilutin metir at hetta er eitt stórt brot á ta meginreglu, sum kom í gildi í 1978, og er minnilutin av tí áskoðan, at skulu ávisir bólkar fáa teirra frádráttarfyrimunir aftur, so eiga eisini aðrir bólkar at sleppa uppí part.

Minnilutin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men er av tí áskoðan, at

fjarstøðan uppá 7 km í landsstýrisuppskotinum, eigur at verða broytt til 3 km, og at upphæddin, sum likningarráðið skal áseta samb. viðmerkingarnar á síðu 11, eigur at verða 500 kr. heldur enn 1500 kr. Út frá hesum setir minnilutin fram soljóðandi broytingaruppskot til § 9, 8 a í landsstýrisuppskotinum: »7 km« verður broytt til »3 km millum bygdir«.

Aunars mælir minnilutin til at gera hesar broytingar í skattalógini:

1. Loyvt verður at draga limagjald til vinnufelag frá.
2. Húsaeigarar fáa loyvi at draga 2.000 kr. frá fyri umsiting av húsum og fyri trygging av teimum.
3. Leigari av íbúð fær loyvi at draga 10% av leiguni frá.
4. Mynstraðum fiskimonnum verður loyvdur ein frádráttur uppá 350 kr. fyri hvønn siglingarmánað.
5. Sjómonnum verður loyvt at draga 300 kr. frá um mánaðin fyri sjóklæðir.
6. Reglur verða gjørdar fyri frádrátti av amboðspeningi, viðbót fyri skitið arbeiði og fyri kost hjá útróðrarmonnum umborð.
7. Samlaði frádrátturin í útroknaða lands- og kommunuskattinum av privatum rentum verður hækkaður úr 42 uppí 46% av rentuupphæddini.
8. Barnafrádrátturin í landsskattinum verður hækkaður úr 1000 uppí 1500 kr.
9. Loyvdir verða ávísir frádráttir fyri sjúkrakassa, vanlukkutrygging, livstrygging o.l.
10. Avmarkingar verða gjørdar í avskrivingum av bilum, id bæði verða nýttir til vinnu og eginnýtslu.

Út frá tí, sum er ført fram omanfyri, setir minnilutin fram hesi broytingaruppskot til lóg um landsskatt og kommunuskatt:

1) § 7 í skattalógini fær hetta orðaljóð:

»Til ábót og umsiting av sethúsum kunnu kr. 2.000 verða drignar frá árliga. Útreiðslur til trygging av sethúsum kunnu umframt verða drignar frá.

2. stk. Leigari av íbúð kann draga 10% av leiguni hægst 2.000 kr. frá. Treyt er, at goldin leiga og hvønn goldið er til, verður uppgivið.«

1) § 7 i skatteloven får følgende ordlyd:

»Til reparation og vedligeholdelse af beboelsesejendomme kan fratrækkes kr. 2.000 årligt. Udgifter til forsikring af beboelseshuse kan endvidere fratrækkes.

Stk. 2. Lejer af lejlighed kan fratrække 10% av lejen højst kr. 2.000. Det er en forudsætning, at betalt leje og til hvem, der er betalt, oplyses.«

2) Í § 9 verður sett sum nýtt punkt 8:

»Limagjald til vinnugevarafelag

2) I § 9 sættes som nyt punkt 8:

»Medlemsskab til erhvervsvirk-

og annan yrkisfelagsskap, sum hava til høvuðsendamál at varða um figgjarstandin hjá teirri vinnugrein sum tann skattskyldugi er í.«

somheds foretagende og anden beskæftigelses fællesskab, der har til hovedformål at konsolidere den finansielle situation i den erhvervsgren som den skatpligtige deltager i.«

3) Í § 9 í skattalógini verður sett sum nýtt punkt 9:

»Mynstraðir fiskimenn við føroyskum fiskiførum, sum fáa inntøku sum løn og/ella part í veiðu, herundir minstuløn og prísviðbót, og sjómenn við føroyskum farmaskipum, ið sigla uttanlands ella millum Føroyar og útland og ikki eru undir danskari sjómansskatting, kunnu draga 350 kr. frá fyri hvønn siglingarmánað í inntøkuárinum. Sjómonnum er loyvt at draga frá fyri sjóklæðir 300 kr. fyri hvønn siglingarmánað. Eftir nærri reglum, ið verða ásettar av Likningarráð Føroya og góðkendar av Føroya Landsstýri, verður loyvt útróðrarmonnum at draga frá fyri kost umborð. Somuleiðis verður loyvt at draga frá fyri amboðspening og fyri skitið arbeiði eftir nærri reglum, ið verða ásettar av Likningarráð Føroya, og sum vetða góðkendar av Føroya Landsstýri.«

3) I § 9 i skatteloven sættes som nyt punkt 9:

»Mønstrede fiskere med færøske fiskerskibe, der erholder indtægt som løn og/eller andel i fangst, herunder mindsteløn og pristilskud, og sømænd med færøske fragtskibe, der sejler udenlands eller mellem Færøerne og udlandet og som ikke er underkastet dansk sømandsbeskatning, kan fratrække 350 kr. for hver måned der er sejlet i indtægtsåret. Søfolk kan fratrække for søbeklædning 300 kr. for hver måned, der er sejlet. Efter nærmere regler, der fastsættes af Færøernes Ligningsråd, som er godkendt af Færøernes Landsstyre, tillades hjemmefiskere at fratrække udgifter til kost ombord. Ligeledes tillades fradrag for redskabsudgifter og for snavset arbejde efter nærmere regler, der fastsættes af Færøernes Ligningsråd, og som bliver godkendt af Færøernes Landsstyre.«

4) Í § 26, 1. stk. í skattalógini verða »1.000 kr.« broytt til »1.500 kr.«.

4) I § 26, stk. 1 i skatteloven ændres »1.000 kr.« til »1.500 kr.«.

5) Í § 27, 6. stk. í skattalógini verða »28% av rentuupphæddini« broytt til »30% av rentuupphæddini«, og í § 33, 2. stk. verða »14% av rentuupphæddini« broytt til »16% av

5) I § 27, stk. 6 i skatteloven ændres »28% av rentebeløbet« til »30% av rentebeløbet« og i § 33, stk. 2 bliver »14% af rentebeløbet« ændret til »16% af rentebeløbet«.

rentuupphæddini«.

6) Í lóg nr. 51 frá 29. december 1971 um skatt av rentutrygging v.m. fær § 1 b hetta orðaljóð: »Onnur gjøld enn tey, sum nevnd eru undir a, og sum av tí skattskylduga eru nýtt til sjúkratrygging, vanlukkutrygging, livstrygging, eftirlønar- og einkjuuppihald, eisini gjøld frá løntakara til eina kapitaleftirlønarskipan, sum kemur undir reglurnar í § 3 — Frádrátturin í tí skattskyldugu inntøkuni kann ikki tilsamans vera størri enn 1200 kr. fyri leys og 1600 kr. fyri hjún.«

6) I lov nr. 51 af 29. december 1971 om beskatning af renteforsikring m.m. får § 1 b følgende ordlyd: »Andre beløb end dem, der er nævnet under a, og som af den skattepligtige er anvendt til sygeforsikring, ulykkesforsikring, livsforsikring, pensions- og enkeforsørgelse, herunder også arbejdstagerbidrag til en kapitalspensionsordning, som kommer under reglerne i § 3 - fradraget i den skattepligtige indkomst kan ikke blive større end 1.200 kr. for enlige og 1.600 kr. for ægtepar.«

7) Í lóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. verður í § 2 sett hetta uppískoyti til stk. 4: »Tó kunnu persónbilar í mesta lagi verða avskrivaðir við 20% av 6/10 av keypsvirðinum« og í § 7 í somu lóg verður sett sum nýtt 4. stk.: »Hóast reglurnar í 2. stk. skulu bilar, sum verða nýttir bæði til vinnu og eginnýtslu í mesta lagi avskrivast við 20% av 6/10 av keypsvirðinum.«

7) I lov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.m. sættes i § 2 dette tillæg til stk. 4: »Dog skal personbiler højst kunne afskrives med 20% af 6/10 af købsværdien« og i § 7 i samme lov sættes som nyt stk. 4: »Uanset regler i stk. 2 skal biler, som bruges såvel til eget forbrug i det højeste afskrives med 20% af 6/10 af købsværdien.«

2. viðgerð 25. januar. Atkvøðugreiðsla 26. januar. Uppskot frá minniluta í nevnd samtykt við 17-0. Eftir uppskoti frá Hilmar Kass, løgtingsmanni varð málið aftur beint í skattanevndina, sum 12. februar legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Málið var undir 2. viðgerð aftur beint í skattanevndina. Nevndin hevur havt fund

um málið, og viðmerkir meirilutin (Jógvan Sundstein, Hilmar Kass og Eli Nolsøe) fylgjandi:

Út frá viðgerðini av málinum higartil skjýtur meirilutin upp, at avmarkingin til ávíst minstatal av km í fjarstøðu millum heim og arbeiðsstað, tá ið talan er um frádrátt fyri ferðing við bili, fellur burtur, og avmarkingin framyvir bert verður, at útreiðslurnar uppgjørdar eftir reglunum í hesari lóg kunnu frádragast í tann mun, tær eru størri enn ávís árlig upphædd ásett av líkningarráðnum. Meirilutin tekur undir við, at henda upphædd fyir komandi likning hóskandi eigur at vera tær 1500 kr. nevndar í uppskoti landsstýrisins. Í hesum sambandi verður tó tann broyting gjørd, at avmarkingin verður galdandi fyri innanoyggja ferðing, uttanlands ferðing og dupult húsarhald hvørt sær.

Meirilutin mælir ti til at samtykkja lógaruppskot landsstýrisins við hesum broytingaruppskoti til landsstýrisuppskotið:

Í § 1 verða gjørdar hesar broytingar:	§ 1 formuleres således:
1) § 9, 8) verður orðað soleiðis: »hjá persóni, sum hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, neyðugar útreiðslur í samband við ferðing millum bústað og arbeiðsstað eftir reglunum í a) - g).	1) § 9, 8) affattes således: »hos er person, der har lønindtægt, herunder indtægter ved partsfiskeri, nødvendige udgifter i forbindelse med transport mellem bopæl og arbejdssted efter reglerne i a) - g).
a) Útreiðslur til ferðing við bili millum bústað og arbeiðsstað verða loyvdar frádrignar við ávísari upphædd fyri hvønn koyrdan km.	a) Udgifter til transport med bil mellem bopæl og arbejdssted tillades fratrukket med et bestemt beløb for hver kørt km.
b) Kann almenn ferðsla verða nýtt í staðin, verður frádráttur loyvdur ájavnt við ferðakostnaðin við almenna rutusambandinum.	b) Såfremt offentlig transport kan benyttes, tillades fradrag af samme størrelse som transportudgiften ved offentlig transport.
c) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað sjóvegis verður frádráttur loyvdur ájavnt við útreiðslur, men tó ongantíð meira enn svarandi til ferðakostnaðin við almennum rutusambandi. Útreiðslurnar sambært reglurnar í a) - c) verða tó	c) For søvejs transport mellem bopæl og arbejdssted tillades fradrag af samme størrelse som udgiften, dog aldrig mere end transportudgiften ved offentlig ruteforbindelse. Kun den del af udgifterne efter reglerne i a) - c), der overstiger et nærmere

bert loyvdar frádrignar í tann mun samlaða upphæddin fer upp um eina ávísa upphædd, sambr. g).

bestemt beløb, jfr. g) kan fradrages.

d) Fyri ferðing millum bústað og arbeiðsstað uttanlands verður frádráttur loyvdur sambært skalføstum frádrátti uppá 6.000 kr. um árið, tó í mesta lagi ájavnt við lønarinntøkuna. Frá og við 1. oktober 1982 verður frádrátturin prístalsviðgjørdur við prístalinum pr. 1. oktober 1981 sett til 100.

d) For transport mellem bopæl og arbejdssted udenlands tillades fradrag i henhold til dog højst så meget, som svarer til lønindtægten. Fra og med 1. oktober 1982 bliver fradraget pristalsreguleret med pristallet pr. 1. oktober 1981 sat til 100.

g) Tær í a) - e) nevndu føstu upphæddir verða ásettar av likningarráðnum í seinasta lagi 1. oktober, sum galdandi fyri komandi skattaár.

g) De i a) - e) nævnte faste beløb fastsættes af ligningsrådet senest 1. oktober, gældende for det kommende skatteår.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen) setir einki uppskot fram, men heldur seg til uppskotið, sum varð sett fram undir áliti I.

Framhaldandi 2. viðgerð 12. februar. Málið varð aftur beint í skattanevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

ÁLIT
III

Málið var fyri aðru ferð undir 2. viðgerð beint aftur í skattanevndina. Nevndin hevur havt fund og hevur býtt set í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) mælir til, at uppskotið sambært álit II verður samtykt.

Ein minniluti (Vilhelm Johannesen) metir, at málið nú er vorðið so fløkt, samstundis sum tað hevur rættiliga stóran principiellan týdning við umleggingina til kelduskatt, at tað ikki verður avgreitt nú, men verður sent landsstýrinum aftur.

Ein annar minniluti (Finnbogi Isaksen) heldur fast við, at mark upp á 3 km er fast tal, og vit ikki kunnu ganga við til so óskiljandi lógargreinir, sum meirilutin ætlar at samtykkja. Hesar smildir, sum meirilutin við talfrøðinginum Jógvani Sundstein á odda hevur funnið uppá, kunnu bæði brúkast og misbrúkast. Fyri okkum í minni-

lutanum tykist tað, sum um meirilutin als ikki hevur skilt, hvussu hetta nýggja lógaruppskot kann nýtast. Út frá hesum mælir minnilutin til at útseta málið.

Framhaldandi 2. viðgerð á seinni fundi sama dag. § 1, pkt. 1 í áliti II uppskot frá meiriluta í nevndini, broyting í landsstýrisuppskotið, samtykt við 18-0, pkt. 2 við 17-0, pkt. 3 við 17-0, pkt. 4 fall við 12-0, pkt. 5 samtykt við 25-0, pkt. 6, 1. samtykt við 22-0, pkt. 6, 2. samtykt við 23-0, pkt. 6. 3 við 20-0, 3 a, b, c, d, e samtykt við 20-0, 4 samtykt við 19-0, 5 við 20-0, 6 við 19-0, 7 við 22-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

15. februar framhaldandi 2. viðgerð. Formaðurin skeyt upp at taka aftur í áliti II § 1, stk. 1, a. Hetta varð samtykt við 19-0. Málið soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð við 19-0 atkvøðum.

16. februar løgdu tingmenninir Juul Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Sverre Midjord og Ove Mikkelsen fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Sum nýtt 2. stk. b) í § 9 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 verður sett:

»Loyvt verður einkjum, fólka- og avlamispensjónistum eina skattafría inntøku kr. 20.000 um árið«.

»Der tillades enker, folke- og invalidepensionister en skattefri indtægt på kr. 20.000 årlig«.

Sama dag legði meirilutin í skattanevndini (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ 1, stk. 1)a) verður soljóðandi:

»Útreiðslur til ferðing við bili millum bústað og arbeiðsstað verða loyvdar frádignar við ávísari upphædd fyri hvønn koyrdan km«

§ 1, stk. 1)a) affattes således:

»Udgifter til transport med bil mellem bopæl og arbejdssted tillades fratrukket med et bestemt beløb for hver kørt km«

og

§ 1, stk. 3) gongur út.

og

§ 1, stk. 3) bortfalder.

3. viðgerð 16. februar. Broytingaruppskotið frá Juul Jacobsen, Vilhelm Johannesen, Sverra Midjord og Ova Mikkelsen fall við 15 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Signar Hansen, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Broytingaruppskotið frá meiriluta í skattanevndini (álit II frá skattanevndini til § 1, stk. 1. a samtykt við 20-0 atkvøðum og til § 1, stk. 3 samtykt við 31-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.T.j.nr. 430-12-36 Lóg nr. 23 frá 30. apríl 1982.

---

65. Gerð av ferjulegu í Kirkjubø

Ár 1981, hósdagin 3. december legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
løgtingslóg
um

ferjulegu í Kirkjubø

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað

færgeleje i Kirjubø

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på

landskassans vegna at lata gera ferjulegu í Kirkjubø og at læna upp til 18 mill. kr. í hesum sambandi.

§ 2. Hendа lóg kemur í gildi beinanvegin og fara úr gildi samstundis løgtingslógirnar nr. 69 frá 6. september 1963: Løgtingslóg um atløgubryggju í Kirkjubø og nr. 37 frá 2. juni 1970: Løgtingslóg um atløgubryggju í Kirkjubø.

landskassens vegne at lade anlægge et færgeleje i Kirjubø samt at låne indtil 18 mill. kr. i denne forbindelse.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks og samtidig ophæves lagtingslovene nr. 69 af 6. september 1963: Lagtingslov om landingsbro i Kirkjubø og nr. 37 af 2. juni 1970: Lagtingslov om bygning af anløbsbro i Kirkjubø.

Viðmerkingar:

Í Sandoynni hevur síðan seinna kriggið tíðan verið rosað um at fáa ferðasambandið við Havnina lagt um Kirkjubø, mest fyri at sleppa undan at skula fara um Kirkjubønes; men eisini fyri at rutusiglingin millum oyrna og meginlandið kann fara fram við styttri millumbilum. Leggjast kann aftrat, at tílík ruta eisini verður til stóran fyrimun fyri Hest og Koltur.


Tvær ferður áður er róð so tætt framundir at gera hetta ynski til veruleika, at tingið hevur lóggivið um bygging av atløgubryggju í Kirkjubø; men einki er komið burturúr.

Nú er støðan tann, at ikki bert Sandoyggin, men eisini Suðuroyggin kundi fingið gleði burtur úr ferjulegu í Kirkjubø; eisini har suðuri hevur verið ynskt, at aldargamla ferðaleiðin um Sandoynna og Kirkjubø varð tikin uppaftur, og nú bygd er havn í Hvalba, har ferða kann liggja í øllum veðri og atløgumøguleiki verður í Sandi í næstum fyri sjálvt stórari ferju, tørvar bert ferjulega við Kirkjubø, fyri at eisini hetta sambandið kann verða veruleiki aftur.

Ætlanin er at byggja brimgarð út úr Árnanesi sum lívd og í krókinum sunnan fyri henda garð at hava ferjuleguna. Lendið innanfyri er væl egna til bilstøðlar og onnur neyðug tiltøk uppi á landi, og stutt er til veg.

Hóast hesi tiltøk er ikki ætlanin at niðurleggja beinleiðis siglingina Suðuroy Tórshavn.

Kostnaðurin er út frá ti skitsuætlan, gjørd er, mettur at verða einar 16-18 mió. kr. í dagsins prisiegu.


LANDSBYGGIFELAG:0

1. viðgerð 10. december. Málið varð viðgjørt saman við nr. 66: Dýping av Ytra Polli og gerð av pieri í Skopun. Bæði málini vórðu beind í figgjarnevndina.

Málið er ikki afturkomið úr nevndini.

F.L.j.nr. 1811-24.

---

66. Dýping av ytra polli og gerð av pieri í Skopun

Ár 1981, hósdagin 3. december legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

uppskot
til
løgtingslóg
um

dýping av Ytra Polli og gerð av pieri o.ø. í Skopun.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at lata dýpa Ytra Poll í Skopun og har byggja pier o.a.

§ *2.* Heimilað verður eisini landsstýrinum landskassans vegna at læna upp til 35 mill. kr. í sambandi við framjingina av teimum í § 1 nevndu arbeiðum.

uddybning af Ytra Polli samt anlæg af pier m.m. i Skopun.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at lade uddybe Ytra Poll i Skopun og der bygge en pier m.m.

§ *2* Landsstyret bemyndiges ligeledes til på landskassens vegne at låne indtil 35 mill. kr. i forbindelse med realiseringen af de i § 1 nævnte arbejder.

§ 3. Ognanin av ti lendi og teim ognum annars, sum neyðugt er at hava til taks í sambandi við fremjingina av nevndu arbeiðum, er uppgáva hjá Skopunar kommunu, og ber hon allan kostnað av hesum.

§ 4. Táið útbyggingin er framd, verða økið og byggingarnar vanligur partur av Skopunar havn við teim rættindum og skyldum fyri kommunu og havn, sum lógir og aðrar fyriskipanir viðvíkjandi kommunalum havnum tilskila.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 72 frá 29. mai 1980: Løgtingslóg um studning til útbygging av Skopunar havn.

§ 3. Erhvervelsen af grundarealer og ejendomme, som det er nødvendigt at disponere over i forbindelse med udførelsen af omhandlede arbejder er Skopunar kommunes opgave og bekostes alene af denne.

§ 4. Når udbygningen er fuldført, indgår området og bygværkerne som et normalt led i Skopunar havn med de rettigheder og forpligtelser for kommunen og havnen, som love og andre forskrifter vedrørende kommunale havne tilsiger.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks, og samtidig ophæves lagtingslov nr. 72 af 29. maj 1980: Lagtingslov om tilskud til udbygning af Skopunar havn.

Viðmerkingar:

Skopunar havn er í ár dýpt til 6,0 m á miðalvatni, og tann parturin av ferjubryggjuni, sum er undir vatni, er bygdur, meðan havnin var turrløgd. Portrið fyri Álinum er broytt, so tað nú svarar til tað nýggja dýpið, og samstundis er tað umvælt og útgjørt við nýggjum spølum. Portrið fyri sjálva havnina er ætlanin at seta upp í mai/juni 1982.


Sum kunnugt vórðu í 1978/79 gjørdar drúgvar laboratoriukanningar við Skopunar havn fyri at finna fram til, hvørjar atgerðir vóru at taka til fyri at gera tað væl liggjandi og arbeiðandi í havnini í flestu førum, og varð úrslitið, at fyrst og fremst gjørdist neyðugt at byggja pier norður úr Skersendanum og leggja grótkast fram við norðursíðuni á Ytra Polli. Pollurin mátti so økjast nakað norðureftir og dýpast. Royndirnar vístu eisini, at longri pierurin var og longri norður Pollurin varð breiðkaður, betri bleiv úrslitið.

Men ein útbjóðing av eini ávísari kombinatión av pierlongd og breiðking og dýping av Pollinum vísti, at hesi arbeiði eru sera kostnaðarmikil og væl dýrari, enn roknað var við.

Landsstýrið heldur, at rætt er at fremja hesi tiltøk, men fyri at minka um peningaíleggingina eigur at verða gjørdur ein styttri pierur og ein minni breiðking av Pollinum enn í útbodnu byggiætlanini; afturfyri verður so sett portur í innsiglingini til verandi havn.

Henda minkaða byggiætlan bøtir sambært royndunum munandi um viðurskiftini inni í havnini, og tá tað í einkultum førum ikki hjálpir nóg nógv, er portrið til at taka.

Kostnaðurin av øllum, ið framt verður norðan fyri verandi havn — íroknað havnarportrið — er mettur at verða einar 35 mill. kr. í dagsins prislegu, í staðin fyri tær 30 mió. kr., ið áður vóru játtaðar.



1. viðgerð 10. december. Málið varð viðgjørt saman við 65: Gerð av ferjulegu í Kirkjubø. Bæði málini vórðu beind í figgjarnevndina.

Málið ikki afturkomið úr nevndini.

F.L.j.nr. 1811-6.

---

67. Broytingar í ferðslulógini

Ár 1981, hósdagin 3. december legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um ferðslu.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 við seinri broytingum um ferðslu verða hesar broytingar gjørdar:

1) § 2 III a) verður orðað soleiðis:

»*BILUR* (motorvognur): motorakfar, sum hevur 4 ella fleiri hjól ella beltir, rullur, gangara ella tílíkt, og somuleiðis motorakfar á 3 hjólum, sum hevur eginvekt yvir 400 kg.«

2) §§ 5-9 verða avtiknar.

3) § 10 verður orðað soleiðis:

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om færdsel.

§ *1.* I lagtingslov nr. 65 af 9. september 1963 med senere ændringer om færdsel foretages følgende ændringer:

1) § 2 III a) affattes således:

»*BIL* (motorvogn): motorkøretøj, der er forsynet med 4 eller flere hjul eller med bælter, valser meder eller lignende, samt motorkøretøj på 3 hjul, hvis egenvægt overstiger 400 kg.«

2) §§ 5-9 ophæves.

3) § 10 affattes således:

«Fyriskipanir fyri akfør.

Landsstýrið kann fyriseta reglur um tilgerð, útgerð og tilhoyri hjá akfari og um persónliga trygdarútgerð til førara og ferðandi og fyriseta, hvørjar áskriftir og merkir akfør av eftirlitsorsøkum skulu hava. Landsstýrið kann gera av, at tær kunngerðir, sum løgmálaráðið sambært ferðslulógini hevur givið út um stakfyriskipanir um tilgerð og útgerð hjá akførum, skulu heilt ella sum ein part hava gildi her á landi. Kunngerðir um stakfyriskipanir um tilgerð og útgerð hjá akførum eru undantiknar lýsing.

Stk. 2. Landsstýrið kann fyriseta reglur um forboð fyri innflutningi og sølu av útgerð og tilhoyri til akfør og av persónligari trygdarútgerð til førara og ferðandi, um so er at tílíkir lutir ikki lúka tær reglur, ið fyrisettar verða eftir 1. stk., ella nýtslan av teimum hevur við sær vanda ella óneyðugar ónáðir fyri førara ella onnur ferðandi.

Stk. 3. Landsstýrið kann, um tað fyri ferðslutrygdar sakir gerst neyðugt, forbjóða at nýta eitt akfar, sjálvt um tað lýkur tær reglur, sum ásettar verða sambært 1. stk.«

»Forskrifter for køretøjer.

Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om køretøjers indretning, udstyr og tilbehør og om personlig sikkerhedsmæssig udrustning til førere og passagerer samt fastsætte, hvilke påskrifter og mærker køretøjer af kontrolmæssige grunde skal være forsynet med. Landsstyret kan bestemme, at de af justitsministeriet i medfør af færdselsloven udstedte bekendtgørelser om detailforskrifter for køretøjers indretning og udstyr helt eller delvis skal gælde her i landet. Bekendtgørelser om detailforskrifter for køretøjers indretning og udstyr er fritaget for kundgørelse.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om forbud mod indførsel og forhandling af udstyrsdele og tilbehør til køretøjer og af personlig sikkerhedsmæssig udrustning til førere og passagerer, såfremt de pågældende dele ikke opfylder de bestemmelser der fastsættes i medfør af stk. 1, eller de ved deres anvendelse vil medføre, at føreren eller andre trafikanter udsættes for fare eller væsentlig ulempe.

Stk. 3. Landsstyret kan, såfremt færdselssikkerhedsmæssige hensyn gør det påkrævet, forbyde brugen af et køretøj, selv om det opfylder de bestemmelser, der fastsættes i medfør af stk. 1.«

4) § 16. 1. stk., verður orðað soleiðis:
»Fyri rúsdrekkakoyring verður hann revsaður, sum koyrir ella roynir at koyra motordrivið akfar eftir at hava drukkið so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í hlóðinum, meðan hann koyrir ella aftaná fer upp um 1.20 0/00. Sama hevur gildi fyri tann, ið sum sum førari av motordrivnum akfari sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella annars verið fyri ferðsluóhapp, ella løgreglan hevur verið eftir honum, og sum innan fyri 6 tímar aftan á koyringina drekkur so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum í hesum tíðarbili ella aftaná fer upp um 1.20 0/00. Ásetingin í 2. pkt. hevur ikki gildi, um løgreglan hevur latið blóðroynd taka ella hevur gjørt av, at blóðroynd skal ikki verða tikin.«

4) § 16, stk. 1, affattes således:
»For spirituskørsel straffes den, som fører eller forsøger at føre et motordrevet køretøj efter at have indtaget spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet under eller efter kørslen overstiger 1.20 0/00. Det samme gælder den, der som fører af et motordrevet køretøj med eller uden egen skyld har været indblandet i eller iøvrigt udsat for et færdselsuheld eller har været eftersøgt af politiet, og som i et tidsrum af 6 timer efter kørslens afslutning indtager spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet i eller efter nævnte tidsrum overstiger 1.20 0/00. Bestemmelsen i 2. pkt. gælder ikke, såfremt politiet har ladet udtage blodprøve eller har afgjort, at blodprøve ikke skal udtages.«

5) § 16, 3. stk., verður orðað soleiðis:
»Fyri promillukoyring verður hann revsaður, sum, uttan at verða sekur í rúsdrekkakoyring, koyrir ella roynir at koyra motordrivið akfar eftir at hava drukkið so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum, meðan hann koyrir ella aftaná, fer upp um 0.80 0/00. Sama hevur gildi fyri tann, ið sum førari av motordrivnum akfari sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella annars verið fyri ferðsluóhappi, ella løgreglan hevur verið eftir honum, og sum innan fyri 6 tímar aftan á koyringina drekkur

5) § 16, stk. 3, affattes således:
»For promillekørsel straffes den, som uden at være skyldig i spirituskørsel fører eller forsøger at føre et motordrevet køretøj efter at have indtaget spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet under eller efter kørslen overstiger 0.80 0/00. Det samme gælder den, der som fører af et motordrevet køretøj med eller uden egen skyld har været indblandet i eller iøvrigt udsat for et færdselsuheld eller har været eftersøgt af politiet, og som i et tidsrum af 6 timer efter kørslens afslutning

so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum í hesum tíðarbili ella aftaná fer upp um 0.80 0/00. Ásetingin í 2. pkt. hevur ikki gildi, um løgreglan hevur latið blóðroynd taka ella hevur gjørt av, at blóðroynd skal ikki verða tikin.«

indtager spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet eller efter nævnte tidsrum overstiger 0.80 0/00. Bestemmelsen i 2. pkt. gælder ikke, såfremt politiet har ladet udtage blodprøve eller har afgjort, at blodprøve ikke skal udtages.«

6) § 16, 4. stk., verður orðað soleiðis:
»Ásetingarnar í 1. - 3. stk. verða at nýta samsvarandi um tann, sum koyrir, roynir at koyra ella hevur koyrt súklu við hjálpimotori (prutl).«

6) § 16, stk. 4, affattes således:
»Bestemmelserne i stk. 1-3 finder tilsvarende anvendelse på den, der fører, forsøger at føre eller har ført cykel med hjælpemotor (knallert).«

7) § 18, 7. stk., 1. pkt., verður orðað soleiðis:
»Hevur førararættarin verið frádømdur sambært § 59 ella frátikin sambært § 59 b fyri 6 mánaða tíðar skeið ella longri, er tað treyt fyri at fáa hann aftur aftan á, at frádømingar- ella frátøkutíðin er umliðin, at nýggj førararoynd verður staðin.«

7) § 18, stk. 7, 1. pkt. affattes således:
»Har førerretten været frakendt i medfør af § 59 eller frataget i medfør af § 59 b for et tidsrum af 6 måneder eller mere, er det en betingelse for generhvervelse efter frakendelses- eller fratagelsestidens udløb, at ny førerprøve bestås.«

8) § 26 verður orðað soleiðis:

»Skyldur, tá ferðsluóhapp er.
Hvør tann, sum sekur ella ósekur kemur upp í ferðsluóhapp, skal beinan vegin steðga og eftir førimuni veita meiddum hjálp og annars taka lut í leimum tiltøkum til at tryggja ferðsluna, sum óhappið elvir til. Um ein annar, sum er uppi í óhappinum, biður um tað, skal tann avvarandi geva

8) § 26 affattes således:

»Forpligtelser ved færdselsuheld.
Enhver, der med eller uden egen skyld bliver indblandet i et færdselsuheld, skal straks standse og efter bedste evne yde hjælp til tilskadekomne og iøvrigt deltage i de foranstaltninger til sikring af færdslen, som uheldet giver anledning til. Hvis en anden, der er indblandet i uheldet, anmoder herom,

navn og bústað. Somu upplýsingar skulu, tá biðið verður um tað, gevast til, sum ognin hjá ella lutir hava verið fyri skaða.

Stk. 2. Tann, sum sekur ella ósekur skalar ferðslutalvur, merking á akbreyt ella súklubreyt, signalútbúgving ella aðrar ferðsluskipanir, skal beinan vegin fáa merkingina í rættlag aftur, um tað er gjørligt. Ber hetta ikki til, skal avvarðandi gera tað, sum neyðugt er, til at vara onnur ferðandi.

Stk. 3. Hvør tann, sum sekur ella ósekur kemur upp í ella annars verður fyri ferðsluóhappi, hevur skyldu til beinan vegin at boða løgregluni frá ferðsluóhappinum. Henda áseting hevur ikki gildi, um av ferðsluóhappinum bert stendst lítilsverdur skaði á lutir, tó um skaði verður gjørdir á annans manns ogn ella lutir, eisini treytað av tí, at tann, sum skaðan voldi, við tað sama vendir sær til tann, sum fyri skaða hevur verið.«

skal vedkommende opgive navn og bopæl. Tilsvarende oplysninger skal efter anmodning gives den, på hvis ejendom eller ting, der er sket skade.

Stk. 2. Den, der med eller uden egen skyld beskadiger færdselstavler, afmærkning på kørebane eller cykelsti, signalanlæg eller andre færdselsanordninger, skal straks bringe afmærkningen i orden igen, hvis det er muligt. Kan dette ikke ske, skal den pågældende foretage, hvad der er nødvendigt for at advare andre trafikanter.

Stk. 3. Enhver, der med eller uden egen skyld bliver indblandet i eller iøvrigt udsat for et færdselsuheld, har pligt til straks at anmelde færdselsuheldet til politiet. Bestemmelsen gælder ikke, hvis der ved færdselsuheldet udelukkende er sket helt ubetydelig materiel skade, dog i tilfælde af skade på anden persons ejendom eller ting tillige under forudsætning af, at den, der har forvoldt skaden, straks retter henvendelse til skadelidte.«

9) Í § 33 a, 1. stk., nr. 7) verður orðið »ella« strikað.

9) I § 33 a, stk. 1, nr. 7) slettes ordet »eller«.

10) Í § 33 a, 1. stk., nr. 8) verður aftaná orðið »hýruvognur« innsett orðið »ella«.

10) I § 33 a, stk. 1, nr. 8) indføjes efter ordet »hyrevogn« ordet »eller«.

11) Í § 33 a, 1. stk., verður innsett sum sum nr. 9): »á avmerktum steðgpláss hjá bussum styttri enn 12

11) I § 33 a, stk. 1, indføjes som nr. 9): »ved afmærket busstoppested inden for en afstand af 12 meter på

metrar frá hvørjumegin skeltið ella á tí avmerkta strekkinum hvørjumegin skeltið.«

12) § 35 verður orðað soleiðis:

»Lyktaljós.

Tá ið koyrt verður í lyktatendringartíðini skulu tær fyriskipaðu lyktir vera tendraðar. Á fleiri samankoplaðum akførum er bert neyðugt at hava baklyktir tendraðar aftast í vognfylginum og nummarspjaldurlyktina tendraða við aftasta nummarspjaldur í vognfylginum.

Stk. 2. Fjarljós (langt ljós) skal nýtast, tá ið sjónarmáli førarans vegna ferðina á akfarinum annars ikki er nóg góður til trygga koyring.

Stk. 3. Fjarljós (langt ljós) er ikki loyvt at nýta:

1) á strekki, har vegurin hevur nóg gott lýsi,

2) tá ið komið verður ímóti øðrum akfari, og bilið teirra millum er soleiðis, at førarin á tí kann blindast,

3) tá ið koyrt verður aftaná annað akfar, um so er, at tann, sum undan koyrir, kann blindast av fjarljósinum, og tá ið nærljós við ferðini á akfarinum og lýsinum annars í geyma, gevur

hver side af skiltet eller på den afmærkede strækning på hver side af skiltet.«

12) § 35 affattes således:

»Lygteføring.

Ved kørsel i lygtetændingstiden skal de påbudte lygter holdes tændt. På flere sammenkoblede køretøjer er det kun nødvendigt at holde baglygter tændt bagest på vogntoget og nummerpladebelysningen tændt ved vogntogets bageste nummerplade.

Stk. 2. Fjernlys (langt lys) skal anvendes, når førerens synsvidde under hensyn til køretøjets hastighed ellers er utilstrækkelig til sikker kørsel.

Stk. 3. Fjernlys (langt lys) må ikke anvendes:

1) på strækning, hvor vejen er tilstrækkeligt oplyst,

2) ved møde med andet køretøj i sådan afstand fra dette, at føreren kan blændes,

3) ved kørsel bag efter et andet køretøj, såfremt den forankørende kan blændes af fjernlyset og anvendelse af nærlys under hensyn til køretøjets hastighed og lysforholdene i øvrigt giver

føraranum nóg góðan sjónarmála til trygga koyring.

Stk. 4. Um so er, at fjarljós (langt ljós) sambært 2. stk. ikki er hildið neyðugt, ber til at nýta nærljós (stutt ljós). Um ikki er loyvt sambært 3. stk. at nýta fjarljós (langt ljós), skal nærljós (stutt ljós) verða nýtt. Í teimum førum, sum nevnd eru í 5. stk., er tó í staðin loyvt at nýta støðuljós (parkeringsljós).

Stk. 5. Støðuljós (parkergingarljós) er loyvt at nýta, har ið fjølbygt er, um so er, at lýsið er soleiðis, at førarin sær nóg væl, og at onnur ferðandi síggja akfarið nóg langt burtur. Tá ið koyrt verður í toku ella í grovum avfalli, skal tó altið verða nýtt í minsta lagi nærljós (stutt ljós).

Stk. 6. Tokulyktir er einans loyvt at nýta í toku og í grovum avfalli og kunnu, tá so er, nýtast í staðin fyri tær fyriskipaðu lyktirnar. Hjálpilykt er ikki loyvt at nýta til annað enn tað, sum lyktin er ætlað til.

Stk. 7. Lyktir mugu ikki nýtast soleiðis, at aðrir førarar verða blindaðir.

Stk. 8. At nýta aðrar lyktir og onnur endurskin enn ásett ella loyvt er í hesi lóg ella teimum ásetingum, sum givnar eru sambært lógini, er forboðið.«

føreren tilstrækkelig synsvidde til sikker kørsel.

Stk. 4. Såfremt fjernlys (langt lys) efter stk. 2 ikke findes påkrævet, kan nærlys (kort lys) anvendes. Hvis fjernlys (langt lys) i medfør af stk. 3 ikke må anvendes, skal nærlys (kort lys) anvendes. I de tilfælde, der er nævnt i stk. 5, kan dog i stedet for anvendes positionslys (parkeringslys).

Stk. 5. Positionslys (parkeringslys) kan anvendes i tættere bebygget område, såfremt lysforholdene er sådanne, at føreren kan se tilstrækkelig tydeligt, og at andre trafikanter kan se køretøjet på tilstrækkelig lang afstand. Under kørsel i tåge eller kraftig nedbør skal dog altid mindst anvendes nærlys (kort lys).

Stk. 6. Tågelygter må kun anvendes i tåge og under kraftig nedbør og kan i så fald anvendes i stedet for de foreskrevne lygter. Hjælpelygter må ikke anvendes til andet formål end det, hvortil lygten er bestemt.

Stk. 7. Lygter må ikke anvendes således, at andre førere kan blændes.

Stk. 8. Anvendelse af andre lygter og andre refleksanordninger end påbudt eller tilladt i denne lov eller de bestemmelser, der er udfærdiget i medfør af loven, er forbudt.«

13) Sum nýggj § 35 a verður innsett:
»Akfør, sum ikki skulu hava lyktir, skulu í lyktatendringartíðini verða merkt eftir ásetingum, sum landsstýrið fyriskipar.
Stk. 2. Landsstýrið kann ásetа reglur um merking av reiðfólki.«

14) Sum nýggj § 35 b verður innsett:

»Er akfar í lyktatendringartíðini steðgað ella parkerað á vegi, skulu støðuljós (parkeringarljós), baklyktir og nummarspjaldurljós verða tendrað. Landsstýrið kann áseta reglur um, at eisini aðrar lyktir enn tær, sum nevndar eru í 1. pkt., skulu ella kunnu vera tendraðar.
Stk. 2. Akfar, sum ikki skal verða úfgjørt við lyktum, skal, tá ið tað í lyktatendringartíðini er steðgað ella parkerað á vegi, vera merkt eftir reglum, sum landsstýrið ásetir.
Stk. 3. Aðrar lyktir enn tær, sum 1. og 2. stk. fata um, er ikki loyvt at hava tendraðar.
Stk. 4. Er motordrivið akfar, sum ikki er longri og breiðari enn ávikavist 6 m og 2 m, parkerað fram við vegjaðaranum, har ið fjølbygt er, nýtist einans at hava støðuljós (parkeringarljós) og baklykt inn móti miðjuni á vegnum tendrað,

13) Som ny § 35 a indsættes:
»Køretøjer, der ikke skal være udstyret med lygter, skal i lygtetændingstiden være afmærket efter bestemmelser, der fastsættes af landsstyret.
Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om afmærkning af ridende.«

14) Som ny § 35 b indsættes:

»Er køretøj i lygtetændingstiden standset eller parkeret på vej, skal køretøjets positionslys (parkeringslys), baglygter og nummerpladebelysning holdes tændt. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om, at også andre lygter end dem, der er nævnt i 1. pkt., skal eller kan holdes tændt.
Stk. 2. Køretøj, der ikke skal være udstyret med lygter, skal, når det i lygtetændingstiden er standset eller parkeret på vej, være afmærket efter bestemmelser, der fastsættes af landsstyret.
Stk. 3. Andre lygter end dem, der er omfattet af stk. 1 og 2, må ikke holdes tændt.
Stk. 4. Er et motordrevet køretøj, hvis længde og bredde ikke overstiger henholdsvis 6 m og 2 m, parkeret langs vejens kant i tættere bebygget område, behøver kun positionslys (parkeringslys) og baglygte mod vejens midte at være

uttan so at akfarið er koplað aftrat øðrum akfari. Landsstýrið kann áseta reglur um, at serstøk síðulykt verður nýtt í staðin.
Stk. 5. Tá ið samankoplað akfør steðga ella verða parkerað, hevur ásetingin í § 35, 1. stk., 2. pkt., gildi.«

tændt, medmindre køretøjet er tilkoblet andet køretøj. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om, at der i stedet kan anvendes særlig sidelygte.
Stk. 5. Ved standsning eller parkering af sammenkoblede køretøjer gælder bestemmelsen i § 35, stk. 1, 2. pkt.«

15) Sum nýggj § 35 c verður innsett:

»§ 35 b hevur ikki gildi, um vegurin hevur so gott lýsi, at akfarið skilliga sæst nóg langt burturi, ella um tað er steðgað ella parkerað á parkeringarplássi ella øðrum øki, ið er avmerkt til parkering.
Stk. 2. Ljós nýtist heldur ikki at vera tendrað á tvíhjólaðari súklu, tvíhjólaðari súklu við hjálparmotori (prutli) ella tvíhjólaðari motorsúklu við ongum síðuvogni, um so er, at akfarið verður sett uttast á vegjaðaranum.«

15) Som ny § 35 c indsættes:

»§ 35 b gælder ikke, såfremt vejen er så godt oplyst, at køretøjet tydeligt kan iagttages på tilstrækkelig afstand, eller såfremt det er standset eller parkeret på parkeringsplads eller andet afmærket område for parkering.
Stk. 2. Belysningen behøver heller ikke at være tændt på tohjulet cykel, tohjulet cykel med hjælpemotor (knallert) eller tohjulet motorcykel uden sidevogn, såfremt køretøjet henstilles langs vejens yderste kant.«

16) § 58, 5. stk., verður orðað soleiðis:

»Tann, sum koyrir motordrivið akfar, sum krevur førarabræv, tó at rætturin til at koyra ella verða stjóri á slíkum akfari er dømdur frá honum, ella tó at rætturin til hetta er tikin frá honum sambært § 59 b, verður revsaður við hefti ella fongsli upp í 1 ár ella, um serliga linnandi umstøður eru, við bót.«

16) § 58, stk. 5, affattes således:

»Den, der fører motordrevet køretøj, hvortil der kræves førerbevis, til trods for, at retten til at være eller blive fører af sådant køretøj er frakendt ham, eller til trods for, at retten hertil er frataget ham i medfør af § 59 b, straffes med hæfte eller fængsel indtil 1 år eller under særlig formildende omstændigheder med bøde.«

17) § 58 b, 1. stk., nr. 2, verður orðað soleiðis:

§ 33 a, 1. stk., nr. 1, nr. 2, nr. 6, nr. 7, nr. 8 og nr. 9,«

18) § 59 a verður orðað soleiðis:

»Reglurnar i kapitli 93 a i rættargangslógini verða at nýta sum krav um endurgjald fyri frádøming ella frátøku av førararætti vegna saksókn.«

19) Sum nýggj § 59 b verður innsett:

»Frátøka av førararætti.

Løgreglan kann frá persóni, sum ikki hevur fylt 23 ár, taka rættin at føra motordrivið akfar, sum krevur førarabræv, tó ikki súklu við hjálpimotori (prutl), fyri eitt tíðarskeið millum 3 mánaðir og 1 ár, um so er, at tann, sum koyrir slíkt akfar, fremur brot á § 18, 1. stk., ella stórvegis ella uppaftur-likið brot á hesar ásetingar: § 4, § 10, 1. stk., § 23, § 24, 1-2 stk., § 26, § 29, § 30, § 30 a, § 31, § 32, § 32 a, § 34 og § 35.

Stk. 2. Avgerðin hjá løgregluni sambært 1. stk. kann verða skotin til landsstýrið. Kærufreistin er 14 dagar frá tí degi, avvarðandi varð gjørdur kunnigur við avgerðina. Kæra tálmar ikki avgerðina.

Stk. 3. Reglurnar i kapitli 93 a i rættargangslógini verða at nýta um

17) § 58 b, stk. 1, nr. 2, affattes således:

»§ 33 a, stk. 1, nr. 1, nr. 2, nr. 6, nr. 7, nr. 8 og nr. 9,«

18) § 59 a affattes således:

»Reglerne i kapitel 93 a i lov om rettens pleje finder anvendelse på krav om erstatning for frakendelse eller inddragelse af førerretten i anledning af strafforfølgning.«

19) Som ny § 59 b indsættes:

»Fratagelse af førerretten.

Politiet kan fratage en person, der ikke er fyldt 23 år, retten til at føre motordrevet køretøj, hvortil der kræves førerbevis, dog ikke cykel med hjælpemotor (knallert), for et tidsrum af mellem 3 måneder og 1 år, såfremt den pågældende som fører af et sådant køretøj begår overtrædelse af § 18, stk. 1, eller væsentlig eller gentagen overtrædelse af følgende bestemmelser: § 4, § 10, stk. 1, § 23, § 24, stk. 1-2, § 26, § 29, § 30, § 30 a, § 31, § 32, § 32 a, § 34 og § 35.

Stk. 2. Politiets afgørelse efter stk. 1 kan påklages til landsstyret. Klagefristen er 14 dage fra den dag, afgørelsen er meddelt den pågældende. Klage har ikke opsættende virkning.

Stk. 3. Reglerne i kapitel 93 a i lov om rettens pleje finder anvendelse

krav um endurgjald fyri frátøku av førararættinum vegna saksókn.
Stk. 4. Tann, sum førararætturin er tikin frá sambært 1. stk., skal lata førarabrævið frá sær til løgregluna.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

på krav om erstatning for fratagelse af førerretten i anledning af strafforfølgning.
Stk. 4. Den, der i henhold til stk. 1 er frataget førerretten, skal aflevere sit førerbevis til politiet.«

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broytingar í ferðslulógini er gjørt nevndini, ið landsstýrið í 1977 setti at hava eyguni við ferðslulógini og aktuellum ferðslusparningum.
Eftir uppskotinum verða gjørdar fylgjandi broytingar í lógini:

1. Broytingar í reglunum um innrætting og útgerð til akfør, § 1, nr. 1-3.
2. Áseting av reglum, sum gera tað ólógligt at nýta rúsdrekka cina ávísa tíð aftaná, at cin hevur verið uppi í ferðsluóhappi, uttan so at løgreglan hevur avgjørt at blóðroynd ikki skal takast ella er tikin, § 1, nr. 4-6.
3. Broyting í reglunum um skyldur í samband við ferðsluóhapp, § 1, nr. 8.
4. Forboð móti steðging og parkering við bussstøðgiplass, § 1, nr. 9-11 og nr. 17.
5. Endurskoðan av reglunum um nýtslu av lyktum og
6. Serstakar reglur um loyvi til løgregluna at taka førarabræv frá ungum fólki vegna ferðslubrot, § 1, nr. 19, samanber nr. 7 og 16.

Til tær einstøku greinirnar í lógaruppskotinum hevur nevndin gjørt viðmerkingar, sum fylgja hjálagt sum skjal.

Sí skjal 7.

1. viðgerð 9. december. Málið varð beint í lógarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum og við 1. viðgerð 9. december 1981 beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verða í galdandi lóg gjørdar broytingar um innrætting og útgerð av akførum, um skyldur í samband við ferðsluóhapp, nýggjar reglur um ljósføring, forboð fyri nýtslu av rúsdrekka í upp til 6 tímar aftaná ferðsluóhapp og heimild til løgregluna at taka førarabrævið frá førarum undir 23 ár.

Tær broytingar, ið hava verið mest umrøddar undir viðgerðini, eru broytingarnar um forboðið fyri rúsdrekkanýtslu í upp til 6 tímar aftaná ferðsluóhapp og heimildin hjá løgregluni at taka førararættin frá ungum fólki fyri stórvegis ella uppaftur tikin brot á ymsar ásetingar í ferðslulógini.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið frágreiðing frá ferðslunevnd landsstýrisins og havt fundir við nevndirnar í koyrilærarafelagnum og politistafelagnum, umframt at nevndin hevur tosað við advokatarnar Halgir Winther Poulsen og Dánjal Magnussen fyri at hoyra hvørji sjónarmið teir sum forsvarsadvokatar í ferðslumálum hava til broytingarnar um 6-tíma regluna og frátøkuna av koyrikortinum frá førarum undir 23 ár.

Politistafelagið og koyrilærarafelagið taka undir við 6-tíma regluni og regluni um at førarabrøv eiga at kunna takast frá ungum førarum (§ 59 b) tó soleiðis, at koyrilærarafelagið heldur, at reglan átti at verið galdandi fyri allar aldursbólkar.

Forsvarsadvokatarnir vístu á, at 6-tíma reglan stríðir móti vanligum rættarprinsippinum um, at ein ákærdur onga skyldu hevur til at medvirka til uppkláring av brotsverkum, har hann hevur verið uppií, og halda teir annars, at henda regla eins og reglan um frátøku av førarabrævi frá ungum fólki, ikki eru nóg væl undirbygdar við teimum fyriliggjandi hagtølunum.

Koyrilærarafelagið reisti eisini spurningin, um ikki reglurnar um ljósføring áttu at verið broyttar soleiðis, at ein eisini átti at havt skyldu at koyrt við ljósi um dagin, og at reglurnar um støðuljós vórðu broyttar soleiðis, at tær bert kundu brúkast, tá bilurin stóð stillur, og ikki sum nú í ávísum førum, meðan koyrt verður.

Fyriliggjandi hagtøl í viðmerkingunum til lógaruppskotið viðvíkjandi rúsdrekkakoyring vísa, at av 72 møguligum málum, har hesin pástandur kann førast fram, verður pástaðið, at í 24 førum hevur verið drukkið aftaná koyringina. Av hesum 24 verða 12 frlfunnin og 5 fáa linari revsing. Bert í 7 førum verður pástandurin um at hava drukkið aftaná, ikki tikin til fylgju. Løgreglan metir, at hesin pástandur verður meira og meira nýttur, og um øll ferðsluóhapp høvdu verið fráboðað beinan vegin, høvdu tølini helst verið dupult so stór.

Viðvíkjandi frátøku av førararætti frá persónum undir 23 ár, hevur verið vístá, at málið bert kann kærast til landsstýrið og síðan vanliga ikki víðari. Til henda spurning hevur landfútin upplýst, at viðkomandi altíð hevur møguleika fyri at fáa málið fyri rættin við at nokta at rinda ta bót, ið altíð vil verða áløgd í samband við eitt ferðslubrot, har talan kann vera um at frátaka førararættin eftir § 59 í uppskotinum. Kemur rætturin til tað úrslit, at viðkomandi er ósekur, hevur hann rætt til endurgjald, samanber § 59 b, stk. 3.

Viðvíkjandi hagtølunum um ferðsluóhapp hjá ymsum aldursbólkum, hevur ferðslunevndin vístá, at sjálvt tey ungu uttan iva koyra fleiri km enn aðrir aldurs-

bólkar, eiga tey ikki at hava tílsvarandi fleiri óhapp, heldur tvørtur ímóti, tá hetta skuldi givið størri rutinu.

Nevndin metir, at broytingarnar í ferðslulógini kunnu koma at økja um ferðslutrygdleikan, og mælir meirilutin (Agnar Nielsen, Edmund í Garði og Asbjørn Joensen) í nevndini tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) kann taka undir við teim broytingum í galdandi ferðslulóg um innrætting og útgerð av akførum og um skyldur í samband við ferðsluóhapp eins og um nýggjar reglur fyri ljósføring, sum landsstýrið skjýtur upp. Men minnilutin kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins til nýggja § 16 um 6-tíma regluna, soleiðis sum broytingin er orðað. Heldur ikki verður tikið undir við uppskotinum til § 59 b um frátøku av førararætti. Viðvíkjandi spurninginum um rúsdrekkakoyring tekur minnilutin sum nevnt ikki undir við uppskotinum um 6-tíma regluna, soleiðis, sum tað er orðað í uppskoti landsstýrisins, og hevur minnilutin hesa grundir fyri støðu sini.

Fyri tað fyrsta er talan um at broyta tann aldargamla og hevdvunna rættarsið, at ein persónur ikki hevur skyldu at medvirka til at uppklára mál, har hann sjálvur er undir ákæru.

Fyri tað næsta er uppskotið orðað soleiðis, at vit, um uppskotið verður samtykt, verða at kriminalisera nakað, sum lógin sjálv undirstrikar, at viðkomandi kann vera óskkur í.

Fyri tað triðja, at júst henda orðing gongur langt út um tað, sum tilætlað er í norsku lógini (samanber viðmerkingarnar til fyriliggjandi lógaruppskot s.6).

Fyri tað fjórða er prísurin fyri at fáa revsað einar 5-10 rúsdrekkaførarar fleiri enn í dag, tann, at aldargomul hevdvunnin rættarprinsipp verða broytt, nakað sum er átaluvert so mikið meir, sum taltilfarið, sum alt hetta byggir á, er veikt og ófullfiggjað.

Fyri tað fimta verður málsviðgerðin ikki at gerast einfaldari, so sum uppskotsstillarin vil vera við. Hetta tí, at tað ikki er greitt, nær 6-tíma reglan tekur við, og tí at tað mangan verður sera torført at prógva, nær ákærdi hevur sett bilin.

Fyri tað sætta kann ein ikki økja *ferðslutrygdina* við at minka um *rættartrygdina* — tað er ætlan uppskotsstillarans, hvar nøkur ósek fara at verða dømd, fyri at *øll* tey seku skulu kunna verða dømd.

Fyri tað sjeynda metir minnilutin ikki, at tann álvarsama skerpingin, sum liggur í uppskoti landstýrisins, fer at økja munandi um ferðslutrygdina. Ferðslutrygdin í júst hesum føri er ein spurningur um mentan, upplýsing og siðvenjing- og er hetta nakað, ið ein neyvan kann broyta munandi við skerpingum í lóggávuni. Minnilutin vísir í hesum sambandi til viðmerkingar sínar um ferðslutrygdina sum heild aðrastaðni í hesum áliti.

Tá hetta er sagt, so skal minnilutin samstundis viðurkenna, at rúsdrekkakoyring er eitt so álvarsamt vandamál, at ein ávís skerping av lógini, sum kann hugsast virka fyribyrgjandi, eigur at verða sett í verk í ti vón, at hon virkar fyribyrgjandi her og

nú, meðan onnur og munandi meira vittfevnandi tiltøk sum nevnt eiga at verða sett í verk, hóast hesi tiltøk ikki virka og sýna seg í úrsliti fyrr enn um mong ár.

Við hesum í huga ásannar minnilutin at ein bilførari, sum við koyring sini hevur verið manni at bana ella skaða, ikki skal kunna siga seg hava drukkið aftaná, og setir ti fram hetta

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins.

§ 16, 1. stk. 2. pkt. verður orðað soleiðis:

»Sama hevur gildi fyri tann, ið sum førari av motordrivnum akfari, hevur volt manndráp ella persónskaða, og sum innan fyri 6 tímar aftaná endaða koyring drekkur so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum í hesum tíðarbili ella aftaná fer upp um 1.20 0/00.«

§ 16, stk. 1, 2. pkt. affattes således:

»Det samme er gældende for den, der som fører af motordrevet køretøj, har forårsaget manddrab eller personskade, og som i et tidsrum af 6 timer efter kørselens afslutning indtager spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet i eller efter nævnte tidsrum overstiger 1.20 0/00.«

§ 16, 3. stk., 2. pkt. verður orðað soleiðis:

»Sama hevur gildi fyri tann, ið sum førari av motordrivnum akfari hevur volt manndráp ella persónskaða og sum innan fyri 6 tímar aftaná endaða koyring drekkur so nógv rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum, í hesum tíðarbili ella aftaná, fer upp um 0.80 0/00.«

§ 16, stk. 3, 2. pkt. affattes således:

»Det samme er gældende for den, der som fører af motordrevet køretøj, har forårsaget manddrab eller personskade, og som i et tidsrum af 6 timer efter kørselens afslutning indtager spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet i eller efter nævnte tidsrum overstiger 0.80 0/00.«

Minnilutin kann ikki taka undir við uppskotinum um nýggja § 59 b um »frátøku av førararætti«, og heldur ikki við teimum grundgevingum, sum uppskotsstillarin førir fram.

Minnilutin metir, at her er talan um álvarsamt frávik frá galdandi rættarsiði, av ti at lógaruppskotið hevur til fylgju, at brot av sama salag hava ymiskar rættaravleiðingar.

Samstundis er minnilutin greiður yvir, at tiltøk eiga at verða sett í verk til tess at minka um avleiðingar av óvandaligari koyring, men metir at hesar avleiðingar ikki bert standast av koyringini hjá teim 18 til 23 ára gomlu, men heldur er at finna hjá øllum, í eitt ávíst tíðarskeið aftaná koyriroyndina.

Út frá hesum metir minnilutin, at tað eigur at verða umhugsað, at fáa inn í ferðslulógina eina almenna áseting, ið leggur størri ábyrgd á øll, t.d. í 5 ár aftaná lokið føraraprógv, og setir ti fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Í Løgtingið heitir á landsstýrið um at lata ferðslunevndina gera uppskot til generellar reglur um størri ábyrgd fyri øll, sum hava fingið førarabræv, eitt hóskandi tíðarskeið aftaná lokna roynd.

Hetta uppskot eigur at verða lagt fyri tingið í tingsetuni 1982.

Minnilutin er illa við av teimum mongu ferðsluvanlukkum, sum henda um árið í Føroyum, og metir, at tað nú má gerast nakað munandi og álvarsamt við henda landsskaða.

Minnilutin metir ikki, at tað kann minkast munandi um talið av ferðsluvanlukkum ella bøtast um tað óskilið, sum heilt valdar í mongum ferðsluviðurskiftum, við at revsa ávísar aldursbólkar. Her er sum áður nevnt talan um eina heild av ymiskum mentuarligum, sálarfrøðiligum, tekniskum og peningaligum spurningum og vandamálum. Hesi vandamál verða ikki loyst við harðari revsingum av meira ella minni tilvildarligum sniði, men við, at tað frá almennari síðu verður sett inn yvir fyri *øllum* teimum faktorum, ið eru til skaða fyri ferðslutrygdina.

Sum dømi skal verða víst á nøkur tiltøk, ið mugu setast í verk og nakrar spurningar, ið eiga at verða umhugsaðir til tess at økja um ferðslutrygdina. Vísast kann á,

at koyrilæraraútbúgvingin eigur at verða fullkomiliga umløgd og umskipað á sama hátt sum t.d. í Noregi, har koyrilærarar verða útbúgvnir á almennum koyrilæraraskúla,

at læran hjá ti, sum skal taka førarabræv, verður munandi víðkað og samstundis gjørd ókeypis, so ferðslutrygdin ikki í framtíðini á nakran hátt verður knýtt at peningaorkuni hjá ti einstaka,

at ferðslulæran av álvara verður dagligur partur av frálæruni í øllum føroyskum skúlum frá fyrsta til seinasta skúlaár,

at serlig trygdartiltøk verð sett í verk, har nógv børn halda til, og har nógv børn skulu tvørtur um vegin,

at tey gangandi og tey súklandi av álvara verða tryggjað, so hesi ferðandi ikki stútt og støðugt skulu vera stødd í livsvanda úti á gøtuni, soleiðis sum støðan er í dag við fyrilitsleysum vegføringum, tørvandi gongubreytum, tørvandi súklubreytum, samanblanding av gangandi og koyrandi ferðslu og mangan vandafult plaseraðum skúla- og dagstovnabygningum,

at Ráðið fyri ferðslutrygd verður munandi effektiviserað,

at ferðslusendingar gerast fastur táttur í útvarpinum.

Her er sjálvsagt talan um umfatandi og kostnaðarmikil tiltøk, men upp ímóti hesum skal setast tann prísur, vit í dag gjalda í mannalívum, sorgarleikum og í peningi til viðgerðir, endurgjøld og avlamisveitingar.

Tað eigur at havast í huga, at hesi nevndu tiltøk hava skund og samstundis at tey lata seg føra út í lívið — tey eru realistisk. Tað ber t.d. til at seta sum treyt fyri allar komandi koyrilærarar, at teir skulu taka fult *koyrilæraraprógv* í Noregi, ið hevur heimsins bestu koyrilæraraútbúgving, og sum hevur boðið sær til at útbúgva føroyskar koyrilærarar. Henda útbúgving, ið tekur 1. ár, fer fram á Statens Trafiklærerskole í Stjørdal.

Samstundis eiga vit at seta sum treyt, at allir verandi koyrilærarar skulu hava landsgóðkenning og skal ein slík góðkenning bert kunna veitast aftaná umfatandi eftirútbúgving, ið væl at merkja sjálvsagt eingi skal kosta hesum fólkum.

Tá talan er um sjálva koyrilæruna, so er hon í dag alt ov nær tengd at figgjarligu orkuni hjá tí einstaka. Hetta ger, at roynt verður at sleppa sum biligast frá koyrilæruni, og hetta vil siga sum skjótast. Um nú koyrilæran gjørdist ókeypis eins og at kalla øll onnur læra her í samfelagnum, so ber samstundis til at seta munandi størri krøv til tann einstaka, sum skal hava koyrikort og koyriskúlin fær høvi til at geva viðkomandi ein part av tí ferðslumentaliteti, ábyrgdarkenslu og koyrivenjing, sum eru fyritreytir fyri betri ferðslutrygd fyri øll. Hetta kann gerast á mangan hátt og undir ymsum formum, men felags fyri allar verður, at tað er nakað sum tekur tíð, og tíð er nakað, sum tann, sum lærir seg at koyra bil í dag, ikki hevur, tí tíðin kostar honum stórar upphæddir. Tá nú *fritíðarlógin* er komin á tingborð, har hon eftir øllum at døma verður samtykt, so eigur at verða havt í huga, at hon opnar møguleikar fyri ókeypis og biligum undirvisingartilboðum í nógv størri mun, enn talan er um við tí kvøldskúlalóg, ið vit virka undir í løtuni. Tað skuldi sostatt um ikki so langa tíð verið møguligt at farið undir alment ella lutvist alment fyriskipaða koyrifrálæru eftir fritíðarlógini.

Niðurstøða minnilutans er tí tann, at broytingar eiga at verða gjørdar hæði í koyrilæruni og koyrilæraraútbúgvingini og setir tí fram uppskot til samtyktar um hetta saman við Peturi Reinert aðrastaðni í hesum áliti.

Minnilutin (Petur Reinert) kann sum heild góðtaka ta frágreiðing, sum meirilutin í nevndini førir fram. Kortini kann ikki fult takast undir við teirri útlegging, sum

meirilutin í nevndini hevur av teimum tallýsingum (statistikki), sum vórðu fram lagdar í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Áðurnevnda tilfar er rættiliga tilvildarligt og ikki nóg mikið til umboðandi at leggja nakran úrskurð ella tryggar metingar á.

Minnilutin kann av fullum huga taka undir við teimum hugsanum, sum liggja sum grund undir hesum uppskoti, nevniliga at gera ferðsluna so trygga sum gjørligt, so at sum minst av óhappi og mannskaða standast av henni. Og ikki minst tekur minnilutin undir við teirri hugsan at rúsdrekka og onnur doyvandi evni als ikki eiga at vera nýtt av teimum, sum skulu koyra bil ella onnur akfør.

Minnilutin ynskir onkra minni broyting í uppskoti landsstýrisins, men í tveimum førum kann minnilutin ikki taka undir við uppskotsstillaranum (í øðrum førinum partvis ikki, í hinum als ikki).

Minnilutin kann ikki taka undir við orðaljóðinum til broytingarnar í § 16. Broytingarnar eru í stríð við gamlan rættarsið, og tekur ósek fólk við. Uppskotið gongur eisini út um tað, sum norska uppskotið (sum hetta uppskot er smíðað eftir) fyrisetir. Kortini metir minnilutin, at rúsdrekkanýting aftaná álvarslig ferðslu-óhapp ikki eigur at verða brúkt sum undanførsla av teimum, sum hava verið beinleiðis uppi í slíkum, og setir minnilutin fram fylgjandi.

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins.

§ 16, 1. stk. 2. pkt. verður orðað soleiðis:

»Sama hevur gildi fyri tann, ið sum førari av akfari, hevur verið uppi í álvarsligari ferðsluvanlukku, sum hevur ført við sær álvarsligan skaða á annara ogn ella, sum hevur volt fólki mein ella manndráp, og sum innanfyri 6 tímar aftaná koyring drekkur so mikið av rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum í hesum tíðarbili ella aftaná fer upp um 1.20 0/00.«

§ 16, stk. 1, pkt. 2, affattes således:

»Det samme er gældende for den, der som fører af motorkøretøj, har været indblandet i alvorligt færdselsuheld, der har medført alvorlig skade på anden mands ejendom, har forvoldt mennesker skade eller død og som indenfor 6 timer efter kørslen drikker så meget alkohol, at alkoholstyrken i blodet i dette tidsrum eller efter overstiger 1.20 0/00.«

§ 16, 3. stk. 2. pkt. verður orðað soleiðis:

»Sama hevur gildi fyri tann, ið sum

§ 16, stk. 3, pkt. 2 affattes således:

»Det samme er gældende for den, der

førari av akfari, hevur verið uppi í álvarsligari ferðsluvanlukku, sum hevur ført við sær álvarsligan skaða á annara ogn ella, sum hevur volt fólki mein ella manndráp, og sum innanfyri 6 tímar aftaná koyring drekkur so mikið av rúsdrekka, at alkoholstyrkin í blóðinum í hesum tíðarbili ella aftaná fer upp um 0,80 0/00.«

som fører af motorkøretøj, har været indblandet i en alvorlig færdselsulykke, der har forvoldt en alvorlig skade på andens ejendom, eller som har skadet eller dræbt mennesker og som indenfor 6 timer efter kørselen drikker så meget alkohol, at alkoholkoncentrationen i blodet i dette tidsrum eller derefter overstiger 0,80 0/00.«

Minnilutin metir, at tá koyrt verður millum bygdir, er altið lættari at siggja akfar, sum hevur ljósini tendrað, óansæð hvussu lýsið annars er. Høvdu øll akfør altíð ljósini tendrað, vóru kanska onkur ferðsluóhapp ikki hend og setir minnilutin ti fylgjandi.

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins.

§ 35 verður orðað soleiðis. Sum nýtt stk. 2 verður sett:
»Á ferð bygdanna millum skulu nærljósini (stutt ljós) altíð vera tendrað tá fjarljós (lang ljós) ikki er páboðið.«
2. stk. verður síðan 3. stk. o.s.fr.

§ 35 affattes således:
Som nyt stk. 2 indsættes:
»Ved kørsel mellem bygder skal nærlysene (kort lys) altid være tændt når langt lys ikke er påbudt.«
Stk. 2 bliver herefter stk. 3 o.s.v.

Minnilutin kann ikki taka undir uppskoti landsstýrisins til nýggja § 59 b. Hetta uppskot má haldast at vera eindømi í føroyskari lógarsøgu.

Uppskotið er brot á galdandi rættarsið og hartil í sjálvum sær sterkt diskriminerandi mótvegis ávísum aldursbólki, sum í stóran mun er fullmyndugur.

Uppskotið gevur løgregluni dómsvald utan rættargang á ungum fólki fyri brot, sum løgreglan kann útleggja nærum sum hon sjálv vil, og tá í mongum førum fyri minni álvarsom lógarbrot (smb. §§ 4, 10, 23, 34 og 35). Dómur løgreglunar kann bert skjótast inn fyri landsstýrið og hin dømdi hevur lítlan møguleika at fáa sína søk fyri rættin (smb. § 63 í grundlógini), tí apellur av landsstýrisins úrskurði vil í flestu førum verða avvístur av dómsvaldinum.

Minnilutin kann tískil ikki taka undir við hesum uppskoti og mælir tinginum frá

at samykkja hetta uppskot, tá hugsað verður um, hvat ein samtykt kann skapa av precedens.

Minnilutin heldur, at tað er meiningsleyst, at ferðslan hjá okkum skal kosta so nógv mannalív og mannsskaða - - teir nógvu skaðar á bilar og annað ikki um at tala. Føroyingar hava farið vandaliga um, har skaði kann standast av dagligum yrki á sjógvi og landi, eitt nú í bjørgum, á báti og við byrsu t.d., men í akferðslu tykist skil og fyrivarni tíverri ofta at tvørra í stóran mun. Her krevst ein sinnalagsbroyting í ferðsluni, sum vildi verið til meira gagn enn revsingar aftaná, tá brotini eru framd.

Tað var ikki verri, um løgreglan sást meira í ferðsluni enn hon ger í dag, og avmerkingarnar vóru fleiri og betri. Áherðsla eigur at verða løgd á aðra siðvenju í ferðslu, og eigur størsti dentur at verða lagdur á uppalingina at ferðast við skynsemi í ferðsluni.

Henda uppaling eigur at byrja í heimi og skúla og halda áfram í einum betri og strangari almennum koyriskúla, og Ráðið fyri Ferðslutrygd fær munandi størri peningaupphæddir at ráða yvir.

Minnilutin (Petur Reinert) setur til fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Í Álagt verður landsstýrinum at taka § 59 b aftur og møguliga leggja nýtt uppskot fyri tingið um serligar reglur fyri fólk 2-3 ár aftaná, at tey hava staðið koyri royndina. Revsing fyri brot á hesar reglur má tó kunna skjótast inn fyri dómstólarnar til endaliga avgerð.

UPPSKOT
til
samtyktar

II Álagt verður landsstýrinum sum allarskjótast at endurskoða revsireglurnar fyri brot á ferðslulógina, soleiðis at størri munur verður gjørdur í revsingini fyri álvarslig ferðslubrot og smærri brot á ferðslulógina.

Báðir minnilutarnir (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) seta fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

III Álagt verður landsstýrinum í samráð við avvarðandi stovnar, nevndir og felløg at taka § 64 í ferðslulógini nr. 65/1963 upp til viðgerðar av nýggjum, soleiðis at vit í

fyrstu syftu fáa landsfevnandi almenna, meira umfatandi og betri koyrifrálæru, sum skal vera ókeypis fyri næmingarnar. Strangari krøv kunnu á henda hátt setast til sjálva royndina. Og í øðrum lagi at lógarreglur verða gjørdar fyri føroyskt koyrilæraraprógv (hjá komandi koyrilærarum) og eftirútbúgvingarætlan fyri teir koyrilærarar, sum eru, og sum ætla at halda áfram við teirri nýggju almennu koyrilæruni.

Álagt verður landsstýrinum at leggja hetta fyri tingið sum alliarskjótast.

Framhaldandi 2. viðgerð. Skotið varð upp at beina málið aftur í nevnd. Atkvøðugreiðsla fór fram um, at málið ikki skuldi í nevnd aftur, hetta varð samtykt við 19-0.

Atkvøðugreiðsla 28. apríl. § 1, pkt. 1-3 samtykt við 32-0, pkt. 4-5 fullu við 12-0. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Petur Reinert § 16, 1. stk., 2 pkt. fall við 16 ja-aktvøðum, einari nei-atkvøðu og 15 atkvøddu ikki.

Ja atkvøddu:

Guttorm Klein, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Hans M. Joensen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddi:

Jógvan Olsen.

Atkvøddu ikki:

Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Finnbogi Isaksen, Óli Breckmann, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Danjal Larsen.

Broytingaruppskot frá minnilutanum í nevndini (Jóannes Dalsgaard) § 16, 1. stk., 2. pkt. og 3. stk. 2. pkt. varð samtykt við 17 ja-atkvøðum, 2 nei-atkvøðum og 13 atkvøddu ikki.

Ja atkvøddu:

Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Hans M. Joensen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddu:

Jógvan Olsen og Finnbogi Isaksen.

Atkvøddu ikki:

Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttormur Klein, Hilmar Kass, Fredrik

Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Dánjal Larsen.

Punktini 6-11 vórðu samtykt við 29-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Peturi Reinert § 35 fall við 6-0. Landsstýrisins uppskot pkt. 12-18 samtykt við 29-0, pkt. 19 fall við 5-0. § 2 varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Uppskot til samtyktar frá Jóannes Dalsgaard I fall við 11-0, uppskotið til samtyktar frá Peturi Reinert I og II fullu við 14-0.

28. apríl løgdu tingmenninir Edmund í Garði, Guttorm Klein, Jóannes Dalsgaard, Petur Reinert fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ *1.* Í § 26, 2. og 3. stk. ganga orðini »sekur ella ósekur« út.

§ *2* verður orðað soleiðis:

»Henda lóg kemur í gildi heinanvegin.

2. stk. Lógin verður at endurskoða í løgtingssetuni 1983.«

Sama dag løgdu tingmenninir Edmund í Garði, Petur Reinert, Jóannes Dalsgaard, Guttorm Klein, Adolf Hansen og Eli Nolsøe fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í samráð við avvarðandi stovnar nevndir og felag at taka grein 64 í ferðslulógini nr. 65/1963 upp til viðgerðar av nýggjum, soleiðis at vit fáa betri koyrifrálæru.

Álagt verður somuleiðis landsstýrinum at gera lógarreglur fyri føroyskt koyrilæraraprógv fyri komandi koyrilærarar og at skipa fyri eftirútbúgving fyri teir koyrilærarar, sum eru og sum ætla sær at halda fram.

Álagt verður landsstýrinum at leggja uppskot samsvarandi hesi samtykt fyri tingið so skjótt til ber.

3. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot til § 2 varð samtykt við 24-0. Broytingaruppskot til § 26 fall við 15-0. Lógaruppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 514-5-1 Lóg nr. 89 frá 10. juni 1982.

---

68. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann

Ár 1981, mikudagin 25. november boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Nær ætlar landsstýrið at leggja fram lógaruppskot um stuðul til bjálving (isolering) av húsum hjá pensjónistum, soleiðis sum løgtingið hevur álagt landsstýrinum at gera áðrenn 1. november í ár?

Viðmerkingar:

Hin 28. januar 1981 legði javnaðarflokkurin fram uppskot til løgtingslóg um stuðul til bjálving av húsum hjá pensjónistum, soleiðis sum tað framgongur av løgtingsmáli nr. 17/1980 (vetrarting).

Málið fekk fyrstu viðgerð hin 9. februar 1981 og varð beint í sosialu nevndina, sum legði fram álit hin 3. apríl 1981.

Minnilutin í sosialu nevndini mælti til at samtykkja uppskot javnaðarfloksins, meðan meirilutin mælti til at senda málið til landsstýrið og setti sostatt fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

»Vísandi til løgtingsmál nr. 80/1979 áleggur løgtingið landsstýrinum áðrenn 1. november 1981 at leggja fram lógaruppskot um stuðul til bjálving av húsum hjá pensjónistum.«

Sum kunnugt varð uppskot meirilutans samtykt, og hevur løgtingið sostatt álagt landsstýrinum at koma við uppskoti um bjálving áðrenn 1. novembher í ár. Hesin

dagur er nú farin aftur um bak og gott og væl tað, uttan at nakað uppskot um bjálving er komið á tingbord, og havi eg tí mett tað neyðugt við teimum mongu í huga, sum bíða eftir hesum lógaruppskoti at seta landsstýrismanninum í sosialmálum henda fyrispurning.

1. december varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

16. december svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður soleiðis

SVAR

Spurningurin var soljóðandi:

»Nær ætlar landsstýrið at leggja fram lógaruppskot um stuðul til bjálving (isolering) av húsum hjá pensiónistum, soleiðis sum løgtingið hevur álagt landsstýrinum at gera áðrenn 1. november í ár?«

Ein av teimum fyrstu døgunum eftir at hetta landsstýrið hevið tikið við, varð umrøtt við orkuráðið, at miðast skuldi fram ímóti at gera eina meginætlan fyri orkusparing í Føroyum, bæði á sjógvi og á landi. Arbeiðast skuldi við ætlanini, sum bæði góvu sparieffekt longu eftir stuttari tíð, eins væl og virkast skuldi fram ímóti at gera langtíðarætlanir fyri orkusparing.

Tá ið javnaðarflokkurin legði fram uppskot sítt til løgtingslóg um stuðul til bjálving av húsum hjá pensiónistum, fekk orkuráðið boð um at taka hesi sjónarmið við í sínar samráðingar, og mett var tá, at so mikið av forarbeiðinum kundi veru gjørt hesum viðvíkjandi, at eitt uppskot kundi liggja fyri eina ferð í heyst.

Tann arbeiðsbólkurin, ið settur varð at orða lógaruppskotið, varð liðugur í góðari tíð, men bíðað hevur verið eftir, at ein rættiliga víttfevnandi kanning skuldi verða liðug. Henda kanningin skuldi m.a. royna at kortleggja bjálvingartørvin av teimum eldru húsunum við eini meting um, hvat kostnaðurin fer at verða at bjálva hús av teimum ymisku húsasniðunum, sum tey eldru húsini kunnu býtast upp í, t.d. eini hús við trimpli og kvisti. Haraftrat skal síðani verða gjørd leiðbeining um, hvussu bjálvingin eigur at verða gjørd til tess at fáa best møgulig úrslit og sleppast kann undan teimum óheppnu avleiðingunum av bjálving, t.d. fukti og roti, sum hevur verið aðrastaðni.

Tann parturin av kanningini, sum hevur við bjálving av húsum hjá pensjónistum at gera, verður liðugur í hesum døgum, og væntast kann tí, at lógaruppskotið verður lagt fram, fyrst ið tingið kemur saman aftur í nýggja árinum.

69. Broyting í stýrisskipanarlógini

Ár 1981, hósdagin 10. december legði Karin Kjølbro, løgtingslimur vegna Tjóðveldisflokkin fram

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Færøernes styrelsesordning i særanliggender.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verður § 12 orðað soleiðis:

»Valrætt til løgtingið hava tey, ið hava heimarætt og fastan bústað í Føroyum og eru komin til valrættaraldur, uttan so at viðkomandi er gjørdur ómyndugur.

2. stk. Eingin kann atkvøða, uttan hann er á vallistanum.

3. stk. Valbær til løgtingið eru tey, ið eftir reglunum í 1. stk. hava valrætt til løgtingið, uttan so at viðkomandi er straffaður fyri gerð, sum eftir almennari meting ger hann óverdigan at sita sum løgtingsmaður«.

§ 1. I lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender affattes § 12 således:

»Valgret til lagtinget har enhver, som har indfødsret og fast bopæl på Færøerne og har opnået valgretsalder, medmindre vedkommende er umyndiggjort.

Stk. 2. Ingen kan udøve valgret uden at være optaget på valglisten.

Stk. 3. Valgbar til lagtinget er enhver, som i henhold til bestemmelserne i stk. 1 har valgret til dette, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Reglurnar um valrætt og valbæri til løgtingið eru ásettar í § 12 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum og í § 2 í løgtingslóg um val til Føroya løgting nr. 49 frá 20 juli 1978.

Eftir lógini kann ein missa valrætt og valbæri, um viðkomandi er kendur sekur í gerð, ið er vanærulig eftir almennari hugsan, um henda fylgjan av dóminum er burturdottin. Straffverd gerð er ikki vanærulig, uttan so at ein er dømdur til

treytaleyst fongsul í meira enn 4 mánaðir, arbeiðshús ella trygdarveðhald, og ikki eru liðin meira enn 5 ár frá, at straffin er ústaðin. Eisini kann ein missa valrætt og valbæri vegna móttøku av fátækrastudningi, sum ikki er afturgoldin, ella av ti at ein er farin konkurs.

Reglurnar um, at ein kann missa atkvøðurætt vegna móttøku av fátækrastudningi, ella av ti at ein hevur verið revsaður, kunnu ikki haldast at vera tíðarhóskandi longur, og eru heitini fátækrahjálp og vanærulig gerð ikki til eftir socialu lóggávuni ella straffilógini, og verður tí skotið upp, at valrættur bert verður treytaður av aldri, heimarætti og bústaði.

Í stýrisskipanarlógini eru valrættur og valbæri m.a. treytað av, at viðkomandi hevur fylt 20 ár. Ein broyting í valrættaraldrinum krevur, síðani hann er tilskilaður í hesi lóg, at broytingin verður samtykt av løgtinginum tvær ferðir við løgtingsvali ímillum. Skotið verður upp, at sjálvur aldurin ikki stendur í stýrisskipanarlógini, men í vallógini.

Eftir uppskotinum verður valbæri bert treytað av, at ein hevur valrætt og ikki er revsaður fyri eina ferð, sum ger hann óverdugan at vera tinglim. Eftir § 14 í stýrisskipanarlógini og § 44 í løgtingsvallógini avger løgtingið sjálvt gildi av vali tingmanna, og um ein tingmaður hevur mist sítt valbæri.

Lógin um stýrisskipan Føroya í sermálum kann eftir § 30 bert broytast, um uppskot verður lagt fyri tingið í vanligari tingsetu ella eykatingsetu. Um uppskotið verður samtykt, verður tingið upployst, og nýval fer fram. Verður uppskot samtykt av hesum nývalda tingi, verður tað at staðfesta.

Visandi til hetta leggur Tjóðveldisflokkurin málið fyri tingið at viðtaka fyrstu ferð.

Verður broytingin í stýrisskipanarlógini samtykt, eigur í komandi tingsetu eisini at verða sett fram uppskot um tilsvarandi broyting í § 2 í løgtingsvallógini.

1. viðgerð 19. januar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av Karini Kjølbro tann 10. december 1981 og við 1. viðgerð 19. januar 1982 beint í lóganevndina.

Reglurnar um valrætt og valbæri til løgtingið eru ásettar í løgtingslógini um stýrisskipan Føroya í sermálum og í løgtingslógini um val til Føroya Løgting.

Stýrisskipanarlógin kann bert broytast, um broytingin verður samtykt í tveimum tingsetum við vali ímillum. Eftir uppskotinum verður valrættaraldurin tikin úr stýrisskipanarlógini og kemur hann so bert at standa í vallógini. Aftan á næsta val er so ætlanin at seta fram uppskot um at lækka valrættaraldurin niður í 18 ár.

Í mars 1980 valdi løgtingið eina millumtinganevnd at endurskoða stýrisskipanarlógina, smbr. løgtingsmál nr. 38/1980 (vetrarting).

Meirilutin í nevndini (Guttorm Klein, Edmund í Garði og Agnar Nielsen) heldur tað vera hóskandi, at her umrødda broyting í stýrisskipanarlógini eisini verður viðgjørd í millumtinganevnd og setir sostatt fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Uppskotið verður beint til viðgerðar í millumtinganevndini til endurskoðan av stýrissskipanarlógini.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá Karini Kjølbro.

2. viðgerð 27. apríl. Uppskotið fall við 15 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki.
Ja atkvøddu:

Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.
Atkvøddu ikki:

Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Frederik Olsen, Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Dánjal Larsen og Jógvan Sundstein.

F.L.j.nr. 115-1.

70. Fíggjarløgtingslóg 1982/83

Ár 1981, týsdagin 15. desember legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram uppskot til fíggjarløgtingslóg smbr. skjal nr. 9A við soljóðandi viðmerkingum:

Viðmerkingar:

1. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ

Fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot er hitt fyrsta, sum núsitandi landsstýri ber alla ábyrgd av.

Tað er vorðið til á umleið sama hátt, sum undanfarin fíggjarlógaruppskot. Teir stovnar, ið umsita landsins pening, hava fingið boð um at gera teirra metingar av tørvinum á játtanum fyri komandi fíggjarár. Innkomnu uppskotini eru síðan gjøgnumgingin av landsstýrinum.

1.1. VIÐGERÐIN Í LANDSSTÝRINUM

Undir viðgerðini í landsstýrinum hevur dentur verið lagdur á

1. at avmarka útreiðsluvøksturin hjá almennum stovnum,
2. at vísa varsemi í almennu íløgunum, tó soleiðis at hetta í minst møguligan mun førir vinnuloysi við sær,
3. at meta útreiðslurnar á fíggjarlógini so realistiskt sum gjørligt fyri at sleppa undan eini av stórari eykafíggjarlóg,
4. herumframt hevur verið roynt at venda teirri gongd, sum hevur verið seinnu árini, at ein størri og størri partur av tí almennu virkseminum hevur verið fíggjaður við lántøku heldur enn úr landskassanum.

Fíggjarlógaruppskotið 1982/83 javnvigar við 942 milj. kr., og er hetta ein vøkstur uppá 25% í mun til núgaldandi fíggjarlóg.

Inntøkur landskassans av vanligum skatti eru mettar til 454 milj. kr., sum er 10% størri enn áliknaði landsskatturin í 1981. Inntøkur av tolli eru mettar út frá fyriliggjandi tølum og teim tollhækkingum, sum framdar vórðu í heyst og settar til 444 milj. kr. tilsamans.

Landsstýrið hevur undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum skorið ynskini í innkomnu uppskotunum frá stovnunum niður við umleið 40 milj. kr.

1.2. PRÍS- OG LØNARLAGSFYRITREYTIR

Undanfarin ár hevur tað verið rættiliga ógreitt og stundum rilvildarligt, á hvørjum prís- og lønarstigi, stovnarnir hava gjørt teirra metingar.

Hesa ferð hevur landsstýrið álagt stovnunum at gera metingar út frá teimum

lønarábótum, ið avtalaðar eru fyri tíðarskeiðið 1. apríl 1982 - 31. mars 1983. Harumframt skuldi roknast við teimum aldursviðbótum, ið falla til gjaldingar í sama tíðarskeiði, og loksins skuldi leggjast uppfyri svarandi til 5 prístalsviðbøtur. Fyri aðrar útreiðslur enn lønir er metingin gjørd út frá prísum galdandi 1. juli 1981 + 12 1/2%.

Hetta, at figgjarlógin so vítt tað er møguligt er gjørd við teimum prísum og lønum, ið væntandi verða at galda í ti aktuella figgjarárinum, fer vónandi at føra við sær, at óneyðugt verður við eykajáttan. Eisini fær landsstýrið betur møguleika at krevja, at figgjarlógin veruliga skal yvirhaldast.

Til dømis kann nevnast, at sjúkrahúsverkið fyrr hevur brúkt juliløntirnar sum grundarlag fyri figgjarlógaruppskotinum og komið við einum uppskoti til eykafiggjarlóg í desember. Hesum slepst nú undan.

1. 3. AÐRAR FYRITREYTIR

Heldur ikki hevur verið vanligt undanfarin ár at leggja upp fyri teim útreiðslum, sum standast av lógaruppskotum, ið enn ikki eru løgd fyri tingið. Í hesum figgjarlógaruppskoti eru avsettar knappar 16 milj. kr. til tey lógaruppskot á sosiala økinum, sum landsstýrið ætlar at leggja fyri tingið í hesi tingsetu.

Í fyriliggjandi figgjarlógaruppskoti er skotið upp at læna 52 milj. kr. Í krónum er hetta 21. milj. kr. minni enn í inniverandi figgjarári, men hava vit prís- og lønarvøksturin í huga, er munurin uppaftur størri.

Hetta, at grundarlagið fyri uppskotinum eru prísir og lønir, ið væntandi vera galdandi í figgjarárinum, at lagt er upp fyri til sosialu lógaruppskotini, ið ætlandi verða løgd fyri tingið í vetur, og at tað er minkað um upptikin lán er við til at lýsa ein part av vøkstrinum, sum er út yvir vanligan prís og lønarvøkstur í hesum figgjarlógaruppskotinum í mun til núgaldandi figgjarlóg.

2. FÍGGJARLÓGIN SUM STÝRINGARAMBOÐ

Høvuðsendamálið við figgjarlógini er at stýra tí almenna virkseminum. Spurningurin er bert, hvussu stórur partur av virkseminum, ið veruliga kann stýrast gjøgnum figgjarlógina. Hesin partur er ofta minni enn vanliga verður hugsað um.

2. 1. LÓGARBUNDNAR ÚTREIÐSLUR

Her er fyrst at hava í huga, at rættiliga stórur partur av útreiðslunum á figgjarlógini longu er fastlagdur í øðrum lógum og bert kann broytast, um hesar lógir verða broyttar. Sum dømi kann nevnast pensiónirnar og aðrir tættir av sosiallóggávuni. Eitt annað dømi um lógbundnar útreiðslur er stuðulin til fiskivinnuna, sum ásettur er í serligum lógum.

2. 2. AÐRAR ÚTREIÐSLUR

Aðrar útreiðslur eru eisini truplar at stýra igjøgnum figgjarlógina, av tí at tær avgerðir, sum føra til útreiðslurnar, í stóran mun verða tiknar aðrastaðni enn í

landsstýrinum. Her kann verða hugsað um t.d. heilsuverkið. Í stóran mun er hetta eisini galdandi fyri ein part av skútaverkinum.

Ávísar uppbæddir sum t.d. effektivar veðhaldsbindingar eru torførar at meta um. Sum kunnugt hevur landsstýrið stórar veðhaldsskyldur m.a. yvirfyri vinnulívinum.

Teir útreiðsluposter, sum eru lættastir at stýra, eru tey almennu anleggsarbeiðini, vegir, havnir v.m. Her er talan um stórar upphæddir, so pláss er at skarva burturav. Hinvegin føra sparingar á hesum øki til spurningar um prioritering og hóttandi vinnuloysi.

3. BROYTING Í BÚSKAPINUM UTTAN FYRI FØROYAR

Við tí opna búskapi, ið vit hava, fáa broytingar í búskapinum uttanum okkum alstóran týdning fyri viðurskifti okkara og harvið eisini fyri liggjarlógina.

Við stuttari ávaring kunnu vit koma út fyri prisbroytingum, ið ávirka inntøkuviðurskifti okkara munandi.

Seinnu árini hava vit upplivað ein ójavnan vøkstur í útflutningsprísum okkara, men tíverri samstundis ein uppaftur størri vøkstur og ofta í stórum lopum í innflutningsprísum ikki bert á olju, men eisini á øðrum vørum. Sum heild hevur tað tí gingið striltið hjá okkum at fáa okkara útflutningsprísir at vaksa eins skjótt og innflutningsprísirnar. Hetta sæst best av gongdini í býtislutfallinum, sum síðan 1977 til í dag er versnað eini 25%.

Eisini mugu vit vera greið yvir, at sølumøguleikar okkara í útlondum mugu ávirkast av, at tey lond, ið vit selja til, nú í fleiri ár upp í slag hava havt vánaligar tiðir við lítlum búskaparligum vøkstri.

Valutakursbroytingar kunnu ávirka inntøkuviðurskifti okkara ræktiliga munandi. Her er tað sjálvsagt av størsta týdningi, hvussu tað gongst dønum at halda virðinum á donsku krónuni á einum realistiskum stigi sammett við onnur gjaldoyru. Tað hevur í fleiri ár darvað føroyska búskapin, at danska krónan hevur verið yvirmett, men tykist hon nú at vera komin niður á eina meira realistiska legu. Kortini kann ikki sigast, at javnvág er komin í danska búskapin, so leingi sum Danmark bæði hevur stórt arbeiðsloysi og framvegis stórt hall á gjaldsjavnanum.

Tann búskaparligi politikkur, ið fordur hevur verið í fleiri av viðskiftalondum okkara, hevur ført til eitt ógvuliga høgt rentustig í okkara parti av heiminum, og hevur hetta sjálvsagt skaðað okkum sum lántakandi tjóð. Hetta hevur eisini týdning fyri rentuútreiðslurnar á liggjarlógini. Fleiri av lánum okkara hava sum kunnugt variabla rentu.

4. FØROYSKI BÚSKAPURIN Í LØTUNI

4.1. FISKIVEIÐA OG -VINNA

Tey seinastu tølini fyri fiskiveiðu og fiskivinnu vísa, at veiðiflotin sum heild hevur staðið seg heldur betur í ár enn í fjør. Hýrutølini frá fiskimannafelagnum vísa framgongd í hýrunum pr. mann pr. dag í meginpartinum av flotanum. Hinvegin er okkurt, sum bendir á, at tað hava verið færri mans í vinnu, av tí at skip

eru seld úr flotanum, og onnur skip hava ligið part av árinum, lutvíst orsakað av tvørrandi kvotu. Fiskaprísirnir (avreiðingarprísirnir) eru síðan í fjør í meðal hækkaðir við kr. 0,60 pr. kg. Mett verður, at útreiðslurnar til fiskireiðskap, umvælingar og agn eru hækkaðar 12-15%. Í sama tíðarskeiði er oljan hækkað við 21%. Tá er oljustudningur mótroknaður.

4.2. ÚTFLUTNINGUR

Sambært fyriliggjandi hagtøl fer útflutningsvirðið í 1981 at liggja um góðar 1100 milj. kr., sum er um 100 milj. kr. størri enn í 1980. Serliga var tað 1. fjórðingsár í ár, sum sveik. Tá var útflutningsvirðið 15% lægri enn 1. fjórðingsár 1980. Hin vegin hevur seinna hálvár roynst avbera væl.

4.3. INNFLUTNINGURIN

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu verður við innflutninginum í 1981. Tey tøl, sum vit kenna pr. 1. oktober benda á, at innflutningsvirðið fer at liggja um 1.350 milj. kr., sum somuleiðis er um 100 milj. kr. størri enn í 1980. Tey alsamt vaksandi innflutningstøl kundu bent á, at innløgumøguleikarnir framvegis hava verið góðir og at íløgurnar á landi hava verið stórar m.a. figgjaðar við lántøku uttanlands.

4.4 HANDILS- OG GJALDSJAVNI

Handilsjavnahallið fer út frá tí, sum her er sagt, at verða nakað tað sama sum í 1980, t.e. um 250 milj. kr. Rentubyrðan av uttanlandsskuldini økist, sama ger ríkisstudningurin, soleiðis at gjaldsjavnahallið í 1981 væntiliga verður hitt sama sum í 1980.

4.5. UTTANLANDSSKULD

Tá hall er á gjaldsjavnanum, merkir hetta, at uttanlandsskuldin veksur. Sum kunnugt er rentulagið rættiliga høgt, og tað verður tungt at renta og avdraga hesa vaksandi skuld. Rentubyrða landskassans av verandi lánum er í figgjarlógaruppskotinum sett til 60 milj. kr.

5. ÁVIRKAN Á FÍGGJARLÓGINA

Tað, at innløgurnar tykjast at hava verið hampuliga góðar í 1981, gevur í fyrsta lagi øktar tollinntøkur í landskassan og í øðrum lagi øktar skattainntøkur í 1982/83. Hinvegin má havast fyri eyga, at tann broytingartíð, vit liva í og tann ótryggleiki, ið valdar innan høvuðsvinnuna, kann føra til, at inntøkustreymurin í landskassan kann minka sum frálíður, og at krøvini til landskassan kunnu økjast.

6. LANDSSTÝRISINS METAN AV STØÐUNI

Sitandi landsstýri hevur framt tiltøk til tess at fáa vent búskaparligu gongdini. Hóast hetta, so má ásannast, at enn her ikki til at vísa á itøkiligar broytingar til

tað betra. Orsøkin er m.a. tann veruleiki, at býtislutfallið hevur verið alsamt versnandi, og so tað at útflutningurin fyrra part av árinum sveik. Tað er orsøk til at væenta, at vøksturin í oljuprísinum fer at minka, at býtislutfallið komandi ár fer at batna, og fáa vit líkinda fiskiveiðusáttmálar, so eru við teimum tiltøkum, sum landsstýrið hevur sett og hevur í hyggju at fáa sett í verk, góðar vónir um, at tað fer at eydnast at venda gongdini. Avgerandi neyðugt verður kortini at halda aftur við teim almennu útreiðslunum og at vera varin við óproduktivum iløgum.

7. FÍGGJARLÓGARVIÐGERÐIN

Figgjarlógin verður nú løgd fyri tingið. Undir viðgerðini í figgjarnevndini verður høvi at skifta orð við landsstýrið, sum vil vera til reiðar at koma við ajourførdum metingum um búskaparligu gongdina og hvørja ávirkan, henda kann væntast at fáa á figgjarlógina.

Sí skjal 9 A og B.

10. februar 1982 varð viðmerking til § 13 í figgjarløgtingslógaruppskotinum framløgd.

Sí skjal 9 C.

1. viðgerð 10. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 27. februar legði fram álit.

Sí skjal 9 D.

27. mars løgdu tingmenninir Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg, Hilmar Kass og Ivan Johannesen fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ 17 - 2590/3410: Savn í Hoyvík í grunn
verður broytt til,
Eykafiggjarhjálp til landbúnaðin í grunn

Viðmerkingar:

Úr hesum grunni kann landsstýrið saman við figgjarnevndini játta pening sum figgjarbjálp til jarðarbrúk, sum nýliga hava bygt fjós og velt nógv burtur úr nýggjum.

Sama dag løgdu tinglimirnir Karin Kjølbro, Jona Henriksen, Juul Jacobsen, Hilmar Kass, Eli Nolsøe og Jógvan Sundstein fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT
til
§ 15. 2390. 3208

Aftaná Chr. Høj skal standa:

Poulina Joensen kr. 3000,00

Eisini sama dag løgdu tinglimirnir Adolf Hausen, Finnbogi Isaksen, Atli Dam og Vilhelm Johannesen fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Undirritaðu løgtingsmenn loyva okkum hervið at seta fram soljóðandi broytingaruppskot til § 22 konto 2910/2580: Studningur til politiska upplýsing kr. 950.000,00
Og til § 18 2723: Ráðið fyri ferðslutrygd kr. 250.000,00

Tingmenninir Edmund i Garði, Flemming Mikkelsen, Hilmar Kass, Erlendur Patursson, Juul Jacobsen og Jørgen Thomsen løgdu fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

til § 18 Handil, ídnaður o.t.

2723 Ráðið fyri ferðslutrygd »kr. 200.000,-« verður broytt til »kr. 240.000,-«.

Tinglimirnir Karin Kjølbro, Jóannes Dalsgaard, Vilhelm Johannesen og Erlendur Patursson løgdu fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Broytingaruppskot til § 15 - 2390/3208 Sømdarpeningur til skald og listarmenn:
Undirritaðu løgtingsmenn seta fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskotið

hjá Ova Mikkelsen. Sømdarpeningur til skald og listarmenn verður sett til 220.000 kr.

VIÐMERKING: Zacharias Heinesen, Tróndur Patursson, Poulina Joensen, Marianna Matras, Amariel Norðoy og Bárður Jákupsson.

2. viðgerð 27. mars 1982:

Broytingaruppskot frá meiriluta í figgjarnevnd til § 1 samtykt við 19-0 § 1 soleiðis broytt samtykt við 19-0.

Broytingaruppskot til § 1 frá Ova Mikkelsen fall við 6-0 og frá Atla Dam fall við 7-0.

§ 2 í landsstýrisuppskotinum samtykt við 18-0. Broyting frá Ova Mikkelsen fall við 6-0 og frá Atla Dam fall við 7-0.

§ 3 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 19-0, broyting frá Atla Dam fall við 8-0.

§ 4 í landsstýrisuppskotinum samtykt við 20-0.

§ 5 í landsstýrisuppskotinum samtykt við 26-0.

§ 6 Broyting frá meiriluta í figgjarnevnd samtykt við 18-0, § 6 soleiðis broytt samtykt við 25-0. Broyting frá Ova Mikkelsen fall við 11-0 og broyting frá Atla Dam fall við 10-0.

§ 7 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 25-0.

§ 8 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 26-0.

§ 10 Broyting frá meirilutanum í figgjarnevnd samtykt við 19-0, § 10 soleiðis broytt samtykt við 25-0. Broyting frá Atla Dam fall við 13-0.

§ 11 Broyting frá meirilutanum í figgjarnevnd samtykt við 19-0, § 11 soleiðis broytt samtykt við 24-0. Broyting frá Atla Dam fall við 7-0.

§ 12 Broyting frá meirilutanum í figgjarnevnd samtykt við 17-0, § 12 soleiðis broytt samtykt við 25-0. Broyting frá Atla Dam fall við 8-0.

§ 13 Broyting frá meirilutanum í figgjarnevnd samtykt við 21-0, § 13 soleiðis broytt samtykt við 27-0. Broyting frá Ova Mikkelsen fall við 6-0. Broyting frá Atla Dam til pkt. 1, 2, 3, 4, 5, 7, 8 fall við 14-0 og til pkt. 6 fall við 15 ja-atkv., 17 atkvøddu ikki. Atkvøtt var við navnakalli.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Joannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Hergeir Nielsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Signar Hansen, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Åge Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

§ 14 Broyting frá meirilutanum í figgjarnevnd samtykt við 17-0, § 14 soleiðis

broytt samtykt við 20-0. Broyting frá Atla Dam fall við 13-0 og frá Ova Mikkelsen fall við 12-0.

§ 15 Broyting frá Karini Kjølbro, Jóannes Dalsgaard, Vilbelm Johannesen, Erlendi Patursson til 2390/3208 fall við 11-0, § 15 Broyting frá Ova Mikkelsen 2390/2310 fall við 13-0, § 15 Broyting frá meirilutanum i figgjarnevnd til 2310-2390 samtykt við 19-0.

§ 15 2390/3208 broyting frá meirilutanum (kravdi kvalifiseraðan meirluta) fall við 17-0.

§ 15 broyting frá meirilutanum til 2390/3215, 2390/3230 samtykt við 18-0.

§ 15 i landsstýrisins uppskoti 3204 og 3208 samtykt við 30-0, § 15 soleiðis broytt endaliga samtykt við 20-0.

§ 16 Broyting frá Atla Dam til 2490/3309 samtykt við 32-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 30-0. Broyting frá Ova Mikkelsen fall við 7-0 og broyting frá Atla Dam3440 og 2490-3301 fall við 8-0.

§ 17 Broyting frá meirilutanum samtykt við 18-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 23-0. Broyting frá Atla Dam fall við 7-0 og broyting frá Ova Mikkelsen 2590/3402, 2590/3405 og 2890/3668 fullu við 15-0.

§ 18 Broyting frá meirilutanum samtykt við 17-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 24-0. § 18 broytingar frá Atla Dam 2710 fall við 13-0, 2723 við 13-0, 2732 við 15-0 og 2990-3505 við 8-0.

§ 19. Uppskot landsstýrisins samtykt við 25-0, broyting frá Ova Mikkelsen fall við 15-0.

§§ 20, 21 og 22 samtyktar við 25-0.

§ 23 Broyting frá meirilutanum samtykt við 17-0, greinin soleiðis broytt samtykt við 19-0.

§§ 24, 25 og 26 samtyktar við 24-0.

§ 27 Broytingaruppskot frá Adolf V. Hansen fall við 2-0.

§§ 30 - 40 samtyktar við 18-0.

§ 42 Broyting frá Atla Dam afturtikin.

§§ 41-46 samtyktar við 17-0.

Lógin soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 23-0. Uppskot til samtyktar 1 og 2 frá Atla Dam fullu ávikavist við 11-0 og 12-0.

3. viðgerð sama dag kl. 20.40.

Broytingaruppskot til § 15 frá Karini Kjølbro, Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Jonu Henriksen, Eli Nolsøe og Juul Jacobsen samtykt við 24-0. Broytingaruppskot til § 18 2723 kr. 250.000,00 frá Adolf Hansen, Finnboga Isaksen, Atla Dam og Vilhelm Johannesen samtykt við 17-0. Broytingaruppskot til § 22 2990/2580 frá teim somu fall við 15-0. Lógaruppskotið endaliga samtykt við 26-0.

F.L.j.nr. 400-31 Lóg nr. 35 frá 29. mars 1982.

71. Eykajáttan til Strandfaraskip Landsins

Ár 1981, friggjadagin 11. december legði Atli P. Dam, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at spurningurin um eykajáttan til Strandfaraskip Landsins fíggjarárið 1981/82 verður tikin til viðgerðar í tinginum.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur søkt fíggjarnevndina um eykajáttan uppá kr. 8 milj. til rakstur Strandferðslunnar. Undirritaði metir, at hetta tal er ov lágt sett, heldur er tørvurin 12-13 milj. kr. eyka, tá Tyrlu-flúgvingin verður tikin við.

Andstøðan visti undir viðgerðini í vár av fíggjarlógini greitt á, at tað var ósamsvarandi, tí praktiskt gjørligt at skera játtan Strandferðslunnar niður til 16 milj. kr. Skulu nú 12-14 milj. kr. játtast afturat í fíggjarnevndini, vil hetta í ávísan mun káma útyvir tann veruleika, at samgongan í vár roynir at skapa sína skeivu mynd av evnum sínum til at fremja effektiva sparing, men talan er um so stóra eykaupphædd -- nærum tvífeld játtan — at tingið eigur at taka støðu til hesa játtan.

1. viðgerð 4. februar 1982. Málið varð beint í fíggjarnevndina. Málið ikki afturkomið.

72. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann

Ár 1981, týsdagin 15. december boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Karini Kjølbro, løgtingslimi, sum var soljóðandi:

FYRISPURNINGUR

Hví er túrurin hjá »Tróndi« leygarmorgunin kl. 7.45 tikin av vetrarferðaætlanini, og hví kunnu fólk ikki sleppa beinleiðis úr Havn til Fugloyar og Svínoyar leygarmorgun?

Viðmerkingar:

Í mong ár hevur verið gjørligt at koma beinleiðis úr Havn til Fugloyar og Svínoyar leygarmorgun. Møguligt hevur verið at farið við »Tróndi« úr Havn og so við »Ternuni« um Lorviksfjørð fyri síðani beinleiðis at fara norð í Sund, har »Másin« hevur biðað eftir rutuni úr Klaksvík og við ferðafólki av »Ternuni«.

Hesin møguleiki er nú fokin. Fríggjadag seinnapart er heldur ikki gjørligt at sleppa til hesar útoyggjar á vetrardegi.

Fyri bert stuttari tíð síðani gjørdi sitandi samgonga seg til talsmann fyri at gera Føroyar størri við betri ferðasambandi til útoyggjarnar. Umframt ferðasamband sjóvegis hvønn dag og tvær ferðir fríggjadag og sunnudag fleyg »Tyrla« fleiri ferðir um vikuna til hesar útoyggjar. Nú er munandi skert, og vert er eisini at nevna, at í summar vóru t.d. 3 ferðir ferðasamband mikudag, men kortini var ikki gjørligt at fáa post yvirhøvur.

Bert fá fólk búgva fast í Fugloy og Svínoy um veturin, men nógv av teim ungu, ið eru í skúla- og øðrum útbúgvingarørindum, vitja út hvørt vikuskifti, tá viðrar. Sum støðan er í dag, eru hesar útoyggjar vorðnar fjarari, tí tey, sum halda til í Havn, mugu liggja nátt í Klaksvík fyri at sleppa til Fugloyar og Svínoyar leygarmorgun. Hesum hevði verið sloppið undan, um »Tróndur« sigldi leygarmorgun áðrenn klokkan 8, ella um ruta var úr Havn eftir oyggj til Lorvíkar leygarmorgun.

Niðurstøðan er tí hon,at umframt at missa »Tyrlu«, hava útoyggjarnar, í hesum føri Fugloyggin og Svínoyggin, fingið verri ferðasamband enn tær hava havt, síðani bergholini í Norðoyggjum vórðu gjørd.

16. december varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

16 februar 1982 svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Spurt er, hví túrurin hjá Tróndi leygarmorgun kl. 07.45 er tikin av ferðaætlanini, og hví fólk ikki sleppa beinkeiðis úr Havn til Fugloyar og Svinoyar leygarmorgun.

Samferðslunevndin hevur kannað, hvussu nógv ferðafólk eru henda túrin við Tróndi, og úrslitið av kanningini gjørdi, at teir skutu upp, at túrurin verður tikin burtur. Mett er, at tørvurin hevur ikki verið so stórur at fara leygarmorgun tiðliga úr Havn til Fugloyar og Svínoyar, og sambandið um vikuskiftið annars er jú friggjakvøld og sunnudag, men tað tvørliga í hesum føri er tað, at tað ikki kann siglast um dimmið, og ti sleppa fólk ikki víðari fyrr enn leygarmorgun.

Ein annar møguleiki var, um túrurin kl. 10 leygarmorgun úr Hvannasundi varð broyttur til kl. 12, so høvdu ferðafólk nátt at komið við úr Havn. Hetta kann gerast, um ferðafólk annars vildu tað.

Annars kann upplýsast, at arbeitt verður við ferðasambandi eftir landi, og verður helst ikki leingi, til tað ber til at koma úr Havn og til Norvíkar tann vegin og haðani náa bátin til útoyggjarnar.

---

73. Binding av avskrivaðum peningi Lm 8/80 (vetrarting)

Ár 1982, friggjadagin 22. januar legði skattanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av sjálvstýrisflokkinum tann 1. september 1980 og undir 1. viðgerð 3. september beint í skattanevndina. Vegna valið kom tað ongantíð aftur úr nevnd.

Løgtingið hevur fingið soljóðandi bræv frá Føroya Arbeiðarafelag dagfest 8. september 1981:

»Til Føroya Løgting

Føroya Arbeiðarafelag hevur á stjórnarfundi 22. september 1980 viðgjørt hetta

uppskot frá sjálvstýrisflokkinum, givið ti besta viðmæli og lagt hesa áskoðan fyri tingið.

Ti krevja vit, at hetta mál verður lagt fyri tingið nú til samtyktar.

Føroya Arbeiðarafelag heitir á allar positivar kreftir um at styðja uppskotið.

Við hávirðing
FØROYA ARBEIÐARAFELAG«

Brævið varð framlagt í tinginum 8. september 1981 og beint í skattanevndina.

Ein meiriluti (Vilhelm Johannesen, Finnbogi Isaksen og Hilmar Kass) førir fram, at málið varð lagt fram av sjálvstýrisflokkinum við løgtingsmáli nr. 8/1980: Binding av avskrivaðum peningi.

Í skrivi dagfest 8. september 1981 heitir Føroya Arbeiðarafelag á Føroya Løgting um at taka málið upp av nýggjum.

Føroya Arbeiðarafelag gevur uppskotinum sítt besta viðmæli.

Síðani málið var lagt fram av sjálvstýrisflokkinum tann 1. september 1980, hevur løgtingsval verið, og landsstýrisskifti er farið fram við tí úrsliti, at sjálvstýrisflokkurin nú sjálvur umsitir hetta málsøki í landsstýrinum.

Út frá hesum metir meirilutin, at tað er rættast at áleggja landsstýrinum at koma við uppskoti til løgtingslóg í hesum máli, og setir meirilutin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið uppskot til broyting í skattalógini, soleiðis *at* ein ávísur partur av avskrivaðum peningi í persónligari inntøku verður at gjalda inn í felagið, avskrivingin stavar frá, og *at* rakstrarhall bert kann koma til frádrátt í persónligari sjálvuppgáva, um ávísur partur er goldin í felagið.

Ein minniluti (Eli Nolsøe og Jógvan Sundstein) hevur soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Av tí at skattanevndin er vitandi um at samgongan ætlar at gera ávísar broytingar viðvíkjandi skatting av vinnufyritøkum, sum m.a. miða ímóti at skattur, spardur

vegna avskriving, ikki kann verða brúktur í privatari nýtslu, verður mælt til at senda málið til landsstýrið.

2. viðgerð 25. januar. Atkvøðugreiðsla 26. januar. Uppskotið frá meiriluta í skattanevndini fall við 15-0. Uppskotið frá minniluta samtykt við 18-0.

---

74. Lóg um evnaskráir hjá almennum myndugleikum

Ár 1981, týsdagin 15. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.

lov om offentlige myndigheders registre.

KAPITTUL 1.

KAPITEL 1.

Lógarøki.

Lovens område.

§ *1.* Lógin hevur gildi fyri EDV-skráir, sum verða førdar fyri ta almennu fyrisitingina, og sum innihalda upplýsingar um fólk.

2. stk. Við EDV-skráir er at skilja skráir ella onnur skipað evnisyvirlit, har ið nýtt er elektronisk dataviðgerð.

§ *1.* Loven gælder for EDB-registre, der føres for den offentlige forvaltning, og som indeholder person-oplysninger.

Stk. 2. Ved EDB-registre forstås registre eller andre systematiserede fortegnelser, hvor der gøres brug af

3. stk. Við upplýsingar um fólk er at skilja upplýsingar, sum kunnu vísa til ávís fólk, sjálvt um hetta er treytað av kunnleika um persónnummar, skrásetingarnummar ella tílíka serligar sannanir.

§ *2.* Landsstýrið kann eftir ummæli frá skrásetingareftirlitinum gera av, at lógin skal hava gildi fyri skráir, sum førdar verða fyri nærri tilskilað feløg, stovnar, felagsskapir, v.m., sum ikki verða roknað uppí ta almennu fyrisitingina, um so er at meginparturin av útreiðslunum av virki teirra verður goldin við peningi frá landi, riki ella kommunu.

§ *3.* Landsstýrið kann eftir ummæli frá skrásetingareftirlitinum gera av, at lógin skal hava gildi fyri aðrar skráir við upplýsingum um fólk, sum verða førdar fyri teir myndugleikar og tey feløg, sum nevnd eru í § 1, stk. 1 og § 2.

2. stk. Landsstýrið kann eftir ummæli frá skrásetingareftirlitinum gera av, at lógin heilt ella fyri ein part á samsvarandi hátt skal hava gildi fyri EDV-skráir, sum verða førdar fyri teir myndugleikar og tey feløg o.a.m., sum nevnd eru í § 1, stk. 1 og § 2, og sum hava upplýsingar um vinnufyritøkur o.a.m.

KAPITUL 2.

Stovnan av skráum.

§ *4.* Skráir, sum verða førdar fyri lands- ella ríkismyndugleikar, er

elektronisk databehandling.

Stk. 3. Ved personoplysninger forstås oplysninger, som kan henføres til bestemte personer, selv om det forudsætter kendskab til personnummer, registreringsnumner eller lignende særlige identifikationer.

§ *2.* Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra registertilsynet bestemme, at loven skal gælde for registre, der føres for nærmere angivne selskaber, institutioner, foreninger m.v., som ikke henregnes til den offentlige forvaltning, såfremt udgifterne ved deres virksomhed overvejende dækkes af midler fra land, stat, eller kommuner.

§ *3.* Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra registertilsynet bestemme at andre registre med personoplysninger, der føres for de i § 1, stk. 1 og § 2 nævnte myndigheder og selskaber m.v., omfattes af loven.

Stk. 2. Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra registertilsynet bestemme, at loven helt eller delvis skal finde tilsvarende anvendelse på EDB-registre, der føres for de i § 1, stk. 1, og § 2 nævnte myndigheder og selskaber m.v., og som indeholder oplysninger om erhvervsvirksomheder m.v.

KAPITEL 2.

Oprettelse af registre.

§ *4.* Registre, der føres for en lands- eller statsmyndighed må kun oprettes i

einans loyvt at stovna eftir góðkenning frá landsstýrinum.

2. stk. Áðrenn skrá verður tikin í nýtslu, skal landsstýrið ella tann, sum landsstýrið gevur heimild til tess, hava sett reglur fyri skipan og rakstri av hesari skrá, sum lúka ásetingarnar um hetta í kap. 3-6.

3. stk. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 hava samsvarandi gildi fyri samkoyring av skráum, sum eru tilbúnar við tí í hyggju at røkja ymisk endamál. Hetta rakar tó ikki samkoyring, sum einans er havdur tíð tí í hyggju at gera úrdráttir við hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli.

§ *5.* Áðrenn góðkenning verður givin ella reglur verða settar sum í § 4 nevnt, skal ummæli fáast frá skrásetingareftirlitinum.

2. stk. Í teimum førum, har ið heimildin til at seta reglur sum nevnt í § 4, stk. 2 er latin lægri myndugleika og skrásetingareftirlitið ikki hevur kunnað tikið undir við einum uppskoti til slíka reglur, verður málið lagt fyri landsstýrið, sum tekur ta endaligu fyrisitingarligu avgerð.

§ *6.* Skráir, ið førdar verða fyri kommunumyndugleika, er bert loyvt at stovna sambært avgerð, sum avvarðandi bygda(r)-ráð tekur á fundi.

2. stk. Áðrenn skrá verður nýtt, skal bygda(r)ráðið ella avvarðandi kommunumyndugleiki hava sett reglur fyri skipan og rakstri av hesari skrá, sum lúkar ásetingarnar um hetta í kap. 3-6.

henhold til godkendelse af landsstyret.

Stk. 2. Forinden et register tages i brug, skal der af landsstyret eller den, landsstyret bemyndiger dertil, være fastsat forskrifter om det pågældende registers opbygning og drift, der opfylder bestemmelserne herom i kap. 3-6.

Stk. 3. Bestemmelserne i stk. 1 og 2 gælder tilsvarende ved samkøring af registre, der er oparbejdet med henblik på varetagelse af forskellige opgaver. Dette gælder dog ikke samkøring, der udelukkende foretages med henblik på uddrag i statistisk eller videnskabeligt øjemed.

§ *5.* Forinden der meddeles godkendelse eller fastsættes forskrifter som nævnt i § 4, skal der indhentes en udtalelse fra registertilsynet.

Stk. 2. I tilfælde hvor kompetencen til at fastsætte forskrifter som nævnt § 4, stk. 2, er henlagt til en underordnet myndighed og registertilsynet ikke har kunnet tiltræde et forelagt udkast til sådanne foreskrifter, forelægges sagen for landsstyret, der træffer den endelige administrative afgørelse.

§ *6.* Registre, der føres for en kommunal myndighed, må kun oprettes i henhold til beslutning, der træffes i et møde af vedkommende kommunalbestyrelse.

Stk. 2. Forinden et register tages i brug, skal der af kommunalbestyrelsen, eller af vedkommende kommunale myndighed være fastsat forskrifter om det pågældende registers opbygning og drift, der opfylder

3. stk. Áðrenn avgerð verður tikin ella reglur settar sum nevnt í stk. 1 og 2 skal ummæli fáast frá skrásetingareftirlitinum. Kann skrásetingareftirlitið ikki taka undir við framløgdum uppskoti, verður málið lagt fyri landsstýrið, sum tekur ta endaligu fyrisitingarligu avgerð.

4. stk. Ásetingarnar í stk. 1-3 hava samsvarandi gildi fyri samkoyring av skráum, sum eru tilbúnar við tí í hyggju at røkja ymisk endamál. Hetta rakar tó ikki samkoyring, sum einans er havd við tí í hyggju at gera úrdráttir við hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli.

§ 7. Sambinding við skrá ella eina skipan av skráum, sum gjørdar eru við tí í hyggju at kunna førast fyri kommunumyndugleikar úr fleiri kommunum, er einans loyvd, tá ið skráin ella skráskipanin er góðkend av landsstýrinum, og hetta hevur sett reglur fyri skipan og rakstri av avvarðandi skrá ella skráskipan, sum lúka ásetingarnar um hetta í kap. 3-6.

2. stk. Áðrenn góðkenning verður givin ella reglur settar sum nevnt í stk. 1, skal fáast ummæli frá skrásetingareftirlitinum.

3. stk. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 hava samsvarandi gildi fyri samkoyring av skráum, sum eru tilbúnar við tí í hyggju at røkja ymisk endamál. Hetta rakar tó ikki samkoyring, sum einans er havdur við tí í hyggju at gera úrdráttir við hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli.

4. stk. Kommunumyndugleika er

bestemmelserne herom i kapitel 3-6.

Stk. 3. Forinden der træffes beslutning eller fastsættes forskrifter som nævnt i stk. 1 og 2, skal der indhentes en udtalelse fra registertilsynet. Kan registertilsynet ikke tiltræde et forelagt forslag, forelægges sagen for landsstyret, der træffer den endelige administrative afgørelse.

Stk. 4. Bestemmelserne i stk. 1-3 gælder tilsvarende ved samkøring af registre, der er oparbejdet med henblik på varetagelse af forskellige opgaver. Dette gælder dog ikke samkøring, der udelukkende foretages med henblik på uddrag i statistisk eller videnskabeligt øjemed.

§ 7. Tilslutning til et register eller et system af registre, der er indrettet med henblik på at kunne føres for kommunale myndigheder fra flere kommuner, må kun finde sted, når registeret eller registersystemet er godkendt af landsstyret og dette har fastsat forskrifter om det pågældende registers eller registersystems opbygning og drift, der opfylder bestemmelserne herom i kap. 3-6.

Stk. 2. Forinden der meddeles godkendelse eller fastsættes forskrifter som nævnt i stk. 1, skal der indhentes en udtalelse fra registertilsynet.

Stk. 3. Bestemmelserne i stk. 1 og 2 gælder tilsvarende ved samkøring af registre, der er oprettet med henblik på varetagelse af forskellige opgaver. Dette gælder dog ikke samkøring, der udelukkende foretages med henblik på uddrag i statistisk eller videnskabeligt øjemed.

Stk. 4. En kommunal myndighed må

einans loyvt at luttaka í skrá ella skráskipan, sum nevnd eru í stk. 1, eftir avgerð av avvarðandi bygda(r)-ráði, sum tikin verður á fundi. Avgerðin hjá bygda(r)ráðnum skal beinan vegin verða boðað skrásetingareftirlitinum saman við upplýsing um møguligar serligar treytir fyri luttøkuna.

§ 8. Reglur, sum tær ið nevndar eru í § 4,stk. 2, § 6, stk. 2 og § 7, stk. 1 og broytingar av hesum skulu beint aftaná uppsetingina verða sendar skrásetingareftirlitinum.

2. stk. Tær reglur, sum settar fyri skrá ella skráskipan, skulu vera atkomandi hjá almenningi, tá ið heitt verður á tann ella teir myndugleikar, sum hava ábyrgdina av skráunum, eins væl og á skrásetingareftirlitið. Hetta hevur tó lits- og trygdartiltøk ella avgerandi fyrilit fyri onnur almenn áhugamál gera tað neyðugt at halda hesar loyndar.

kun tilslutte sig et register eller et system af registre som nævnt i stk. 1 i henhold til vedkommende kommunalbestyrelses beslutning, der træffes i et møde. Kommunalbestyrelsens beslutning skal straks meddeles registertilsynet med oplysning om eventuelle særlige vilkår for tilslutningen.

§ 8. Forskrifter som nævnt i § 4, stk. 2, § 6, stk. 2 og § 7, stk. 1, samt ændringer heraf skal straks efter udfærdigelsen fremsendes til registertilsynet.

Stk. 2. De forskrifter, der er fastsat for et register eller et system af registre, skal være tilgængelige for offentligheden, ved henvendelse såvel til den eller de registeransvarlige myndigheder som til registertilsynet. Dette gælder dog ikke i det omfang, hensynet til gennemførelsen af de foreskrevne kontrol- og sikkerhedsforanstaltninger eller afgørende hensyn til andre offentlige interesser gør hemmeligholdelse påkrævet.

KAPITUL 3.

Skráseting og varðveitsla av upplýsingum.

§ 9. Tað er einans loyvt at skráseta upplýsingar, sum skilliga hava týdning fyri at røkja endamálið hjá avvarðandi myndugleika. Harumframt er loyvt at skráseta upplýsingar, sum skilliga hava týdning fyri annan myndugleika til at røkja síni endamál, um so er, at skráin er soleiðis skipað, at einans hesin annar myndugleiki fær nýtt upplýs-

KAPITEL 3.

Registrering og opbevaring af oplysninger.

§ 9. Der må kun registreres oplysninger, der klart er af betydning for varetagelsen af vedkommende myndigheds opgaver. Der må endvidere registreres oplysninger, der klart er af betydning for varetagelsen af en anden myndigheds opgaver, såfremt registret indrettes således, at oplysningerne kun kan benyttes af den anden myndighed.

ingarnar.

2. stk. Ikki er loyvt at skráseta upplýsingar um politisk viðurskifti, sum ikki eru atkomandi hjá almenningi. Aðrar upplýsingar, sum viðvíkja heilt persónligum viðurskiftum, her uppií upplýsingar um ættarslag, átrúnað og lit, um kynslig og revsiverd viðurskifti og eisini upplýsingar um heilsustand og ovurnýtslu av njótingarevnum o.t., er ikki loyvt at skráseta, uttan so at hetta er neyðugt til, at skráin fær røkt síni endamál.

3. stk. Skrásettar upplýsingar, sum fyri aldur ella av øðrum grundum hava mist sín týdning fyri skránna til at røkja síni endamál, skulu strúkast. Skráir, sum javnt og samt verða nýttar, skulu vera soleiðis háttaðar, at upplýsingarnar verða tørvandi førdar til dags.

4. stk. Landsstýrið kann eftir ummæli frá skrásetingareftirlitinum loyva, at eintak av skráum verða flutt til goymslu í skjalasavni við tilskilaðum treytum.

Stk. 2. Der må ikke registreres oplysninger om politiske forhold, som ikke er offentligt tilgængelige. Andre oplysninger, der vedrører rent personlige forhold, herunder oplysninger om race, religion og hudfarve, om seksuelle og strafbare forhold samt oplysninger om helbredsforhold og misbrug af nydelsesmidler og lignende, må ikke registreres, medmindre dette er nødvendigt for varetagelse af registerets opgaver.

Stk. 3. Registreredc oplysninger, der på grund af deres alder eller af andre grunde har mistet deres betydning for varetagelsen af registerets opgaver, skal slettes. Registre, der anvendes løbende, skal indrettes således, at der foretages fornøden ajourføring af oplysningerne.

Stk. 4. Landsstyret kan efter indhentet udtalelse fra registertilsynet tillade, at registereksemplarer overføres til opbevaring i arkiv på nærmere angivne vilkår.

§ *10.* Í reglum fyri skrá kann verða ásett, at ein skrásettur skal fáa boð um skrásetingina. Í boðunum skal vera upplýsing um atgongd hjá skrásetta til at fáa upplýsingar frá skránni eftir ásetingunum í §§ 13-15.

§ *10.* Det kan i forskrifter for et register fastsættes, at der skal gives en registreret meddelelse om optagelse i registeret. Meddelelsen skal indeholde oplysning om den registeredes adgang til at få oplysninger fra registeret efter bestemmelserne i §§ 13-15.

§ *11.* Tørvandi eftirlit skal verða havt til at tryggja, at rangar ella villandi upplýsingar ikki verða skrásettar. Upplýsingar, sum roynast rangar ella villandi, skulu sum skjótast verða stroknar burtur ella rættaðar.

§ *11.* Der skal foretages fornøden kontrol til sikring af, at der ikke registreres urigtige eller vildledende oplysninger. Oplysninger, der viser sig urigtige eller vildledende, skal snarest muligt slettes eller berigtiges.

§ *12.* Tørvandi trygdartiltøk skulu fremjast til at forða fyri, at upplýsingarnar verða misbrúktar ella at óviðkomandi fær tær at vita.

2. stk. Trygdartiltøk skulu um neyðugt fata um makaskjøl og útskriftir úr skránni, heruppií makaskjøl og útskriftir, sum latin eru øðrum myndugleikum.

3. stk. Viðvíkjandi skráum, sum hava upplýsingar av serligum áhuga hjá útlendskum valdi, skulu tiltøk fremjast, sum gera tað møguligt at beina tær burtur ella týna, skuldi kriggj ella tilikt borist á.

§ *12.* Der skal træffes de fornødne sikkerhedsforanstaltninger mod, at oplysningerne misbruges eller kommer til uvedkommendes kendskab.

Stk. 2. Sikkerhedsforanstaltningerne skal om fornødent omfatte kopier og udskrifter af registeret, herunder kopier og udskrifter, der er videregivet til andre myndigheder.

Stk. 3. For de registre, der indeholder oplysninger af særlig interesse for fremmede magter, skal der træffes foranstaltninger der muliggør bortskaffelse eller tilintetgørelse i tilfælde af krig eller lignende forhold.

KAPITUL 4.

Atgongd hjá skrásettum fólki at fáa upplýsingar um seg sjálvan.

§ *13.* Biður skrásett fólk um hetta, skal tann myndugleiki, sum hevur ábyrgdina av skránni, skjótast gjørligt siga tí skrásetta frá teimum upplýsingum, ið eru skrásettar um hann.

2. stk. Í reglunum fyri skránni kann verða ásett, at tann skrásetti við tilskilaðum millumbilum skal fáa útskrift av teimum upplýsingum, sum skrásettar eru um hann, ella at tann skrásetti skal kunna biðja um hetta. Reglur um gjald fyri hetta kunnu verða ásettar.

3. stk. Um fólk, sum er skrásett í sjúkrahússkrá ella aðrari sjúklinga- ella sjúkdómsskrá, vil fáa at vita um tær upplýsingar, sum eru skrásettar um hann, skal hann heita á lækna sín um hetta, og skal hesin skjótast gjørligt snúgva sær til tann myndug-

KAPITEL 4.

Registrerede personers adgang til oplysninger om sig selv.

§ *13.* Fremsætter en registreret person begæring herom, skal den registeransvarlige myndighed snarest muligt give den registrerede meddelelse om de oplysninger, der er registreret om ham.

Stk. 2. Det kan i forskrifterne for registeret fastsættes, at den registrerede med nærmere fastsatte mellemrum skal have udskrift af de oplysninger, der er registreret om ham, eller at den registrerede skal kunne fremsætte begæring herom. Der kan fastsættes regler om betaling herfor.

Stk. 3. Såfremt en person, der er registreret i et sygehusregister eller andet patient- eller sygdomsregister, ønsker at blive gjort bekendt med de oplysninger, der er registreret om ham, skal han fremsætte begæring herom over for sin læge, der herefter snarest

leika, ið hevur ábyrgdina av skránni. Hesin gevur so skjótast gjørligt læknanum tær upplýsingar, ið eru skrásettar um sjúklingin, solciðis at læknin fær latið honum upplýsingarnar.

4. stk. Ásetingin í stk. 1 hevur ikki gildi, um hildið verður, at áhugin hjá tí skrásetta at fáa upplýsingarnar at kenna, eigur at víkja fyri avgerandi fyriliti fyri almennum ella privatum áhugamálum. Hevur hetta einans gildi fyri ein part av upplýsingunum, skal tann skrásetti gerast kunnugur við hinar upplýsingarnar.

5. stk. Ásetingarnar í stk. 1-3 verða ikki at nýta um skráir, sum einans eru gjørdar við tí í hyggju at gera hagfrøðiligar úrdráttir. Fyri aðrar skráir kunnu verða ásett undantøk frá rættinum at fáa upplýsingarnar eftir stk. 1, um so er, at ásetingin í stk. 4 má haldast at bera við sær, at vanliga má verða sýtt fyri tílíkum áheitanum.

6. stk. Skrásett fólk, sum hevur fingið frágreiðing eftir stk. 1-3, kann ikki krevja nýggja frágreiðing fyrrenn 12 mánaðir eftir síðstu frágreiðing, uttan so, at hann kann prógva, at hann hevur serligan tørv á hesum.

§ *14.* Frágreiðingar sambært § 13, stk. 1, sbr. stk. 4, skulu gevast skrivligа, um hetta verður krevt. Í førum, har ið umhugsni fyri tí skrásetta talar fyri hesum, kunnu frágreiðingarnar tó verða givnar sum munnlig frásøgn um innihaldið í upplýsingunum.

2. stk. Frágreiðing til tann skrásetta um upplýsingar sum nevnt í § 13, stk. 3 skal altíð verða givin av lækna hansara

muligt retter henvendelse til den registeransvarlige myndighed. Denne meddeler snarest muligt lægen de oplysninger, der er registreret om patienten, således at lægen kan videregive oplysningerne til ham.

Stk. 4. Bestemmelsen i stk. 1 gælder ikke, hvis den registreredes interesse i at få kendskab til oplysningerne findes at burde vige for afgørende hensyn til offentlige eller private interesser. Gør sådanne hensyn sig kun gældende for en del af oplysningerne, skal den registrerede gøres bekendt med de øvrige oplysninger.

Stk. 5. Bestemmelserne i stk. 1-3 finder ikke anvendelse for registre, der udelukkende er oparbejdet med henblik på at foretage statistiske uddrag. For andre registre kan der fastsættes undtagelser fra retten til at få oplysninger efter stk. 1, for så vidt bestemmelsen i stk. 4 må antages at medføre, at sådanne begæringer i almindelighed må afslås.

Stk. 6. En registreret person, der har fået meddelelse efter stk. 1-3, har ikke krav på ny meddelelse, medmindre han kan godtgøre en særlig interesse herfor.

§ *14.* Meddelelser i henhold til § 13, stk. 1, jfr. stk. 4, skal på forlangende gives skriftligt. I tilfælde, hvor hensynet til den registrerede taler derfor, kan meddelelserne dog gives i form af en mundtlig underretning om indholdet af oplysningerne.

Stk. 2. Meddelelse til den registrerede om oplysninger som nævnt i § 13, stk. 3, skal altid gives af den pågældende

og kann verða givin sum munnlig frásøgn. Ásetingarnar í § 13, stk. 4 hava samsvarandi gildi.

§ *15.* Ivamál um rættin til at fáa upplýsingar eftir § 13, stk. 1, 3, 4 og 6, § 14 eins og eftir reglunum settar sambært § 13, stk. 2 og 5, kunnu verða løgd fyri skrásetingareftirlitið. Avgerðin hjá eftirlitinum kann ikki verða løgd fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.

læge og kan gives i form af mundtlig underretning. Bestemmelserne i § 13, stk. 3 gælder tilsvarende.

§ *15.* Tvivlsspørgsmål om retten til at få meddelt oplysninger efter § 13, stk. 1, 3, 4 og 6, § 14 samt efter forskrifter fastsat i henhold til § 13, stk. 2 og 5, kan indbringes for registertilsynet. Tilsynets afgørelse kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

KAPITTUL 5.

Um at lata upplýsingar til privatar.

§ *16.* Upplýsingar, sum kunnu vísa til ávís fólk, er ikki loyvt at lata víðari til privat fólk og virki v.m., uttan so at hetta stendst av reglunum í §§ 17-19 ella upplýsingarnar frammanundan eru atkomandi hjá almenningi, ella tann skrásetti ella tann, sum virkar hansara vegna, hevur samtykt í hesum.

2. stk. Samtykkið skal vera givið skrivliga og skal hava upplýsing um,

1) hvat slag av upplýsingum, sum kunnu latast víðari,

2) hvørjum upplýsingarnar kunnu latast og

3) hvussu upplýsingarnar kunnu nýtast av ti tilskilaða móttakara.

3. stk. Samtykki fellur burtur í seinasta lagi, tá ið eitt ár er umliðið.

§ *17.* Upplýsingar um ávís fólk er loyvt at lata víðari til privat virki og annað,

KAPITEL 5.

Videregivelse af oplysninger til private.

§ *16.* Oplysninger, som kan henføres til bestemte personer, må ikke videregives til private personer og virksomheder m.v., medmindre dette følger af reglerne i §§ 17-19 eller oplysningerne i forvejen er offentligt tilgængelige eller den registrerede eller den, der handler på hans vegne, har meddelt samtykke hertil.

Stk. 2. Samtykke skal meddeles skriftligt og skal indeholde oplysning om,

1) hvilke typer oplysninger, der må videregives,

2) hvem oplysningerne må videregives til og

3) hvorledes oplysningerne må anvendes af den angivne modtager.

Stk. 3. Samtykke bortfalder senest efter 1 års forløb.

§ *17.* Oplysninger om bestemte personer kan videregives til private virksom-

sum samb. lóg ella avtalu hjálpir til at greiða endamál hjá avvarðandi myndugleika. Tó er bert loyvt at lata upplýsingar viðari, sum eru neyðugar hjá móttøkuvirkinum í arbeiðinum fyri tað almenna. Upplýsingarnar mugu ikki nýtast til onnur endamál enn fyriskipað av tí myndugleika, sum hevur ábyrgdina av skránni.

heder m.v., der i henhold til lov eller aftale medvirker ved løsning af vedkommende myndigheds opgaver. Der må dog kun ske videregivelse af oplysninger, der er nødvendige i den modtagende virksomheds arbejde for det offentlige. Oplysningerne må ikke benyttes til andre formål end fastsat af den registeransvarlige myndighed.

§ *18.* Frá sjúkrahússkráum og øðrum sjúklinga- ella sjúkdómsskráum er loyvt at lata upplýsingar viðari um ávíst fólk til lækna ella tannlækna, sum hevur hetta fólkið til viðgerðar. Eisini er loyvt at lata læknanum upplýsingar um avvarðandi ella onnur fólk, um so er, at upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri viðgerðina av tí skrásetta.

2. stk. Harumframt er loyvt hesum nevndu skráum at lata upplýsingar, sum sanna hvør ein er, og upplýsingar um sjúkuavgerðir v.m. til lækna at nýta í ávisum rannsóknarætlanum. Tað er einans loyvt at snúgva sær til tey skrásettu aftaná í tann mun læknarnir, sum hava viðgjørt tey, sum hetta varðir, geva loyvi til hetta.

3. stk. Aftrat hesum er frá teimum nevndu skráum við góðkenning frá landslæknanum og við tilskilaðum treytum loyvt at lata upplýsingar viðari at nýta í rannsóknum ella ætlanum. At lata upplýsingar viðari til ætlaða samkoyring við skrá, sum lógin ikki fatar um, kann bert verða góðkent, um ummæli frá skrásetingareftirlitinum er fingin frammanundan.

§ *18.* Fra sygehusregistre og andre patient- eller sygdomsregistre kan videregives oplysninger om en bestemt person til en læge eller tandlæge, som har den pågældende person i behandling. Videregivelsen kan til læger også omfatte oplysninger om andre personer, herunder om pårørende, såfremt oplysningerne kan have betydning for behandlingen af den registrerede.

Stk. 2. De nævnte registre kan endvidere videregive identifikationsoplysninger og oplysninger om diagnoser m.v. til læger til brug ved konkrete forskningsprojekter. Der må kun ske efterfølgende henvendelse til de registrerede i det omfang, de læger, der har behandlet de pågældende, giver tilladelse hertil.

Stk. 3. Herudover kan der fra de nævnte registre med landslægens godkendelse og på nærmere angivne vilkår videregives oplysninger til brug ved forskning eller planlægning. Videregivelse af oplysninger med henblik på samkøring med registre, der ikke omfattes af loven, kan kun godkendes efter forud indhentet udtalelse fra registertilsynet.

§ *19.* At nýta í ávísum rættarviður-

§ *19.* Til brug i konkrete retsforhold

skiftum er loyvt at lata einstakar upplýsingar til privat fólk og virki o.o., sum kunnu prógva, at tey hava rættarligan tørv á at fáa hesar upplýsingar, sum týðuliga fer út um umhugsni fyri at halda upplýsingarnar loyndar. Hetta hevur kortini ikki gildi fyri upplýsingar, har serligar reglur um tagnarskyldu eru settar.

2. stk. Loyvt er at lata upplýsingar víðari at nýta í rannsóknum við tilskilaðum treytum. Ásetingin í § 18, stk. 3, 2. pkt. hevur samsvarandi gildi.

kan der videregives enkeltstående oplysninger til private personer og virksomheder m.v., som kan godtgøre at have en retlig interesse i at få de pågældende oplysninger, der klart overstiger hensynet til oplysningernes hemmeligholdelse. Dette gælder dog ikke oplysninger om hvilke der ved lov er fastsat særlige tavshedsforskrifter.

Stk. 2. Der kan videregives oplysninger til brug ved forskning på nærmere angivne vilkår. Bestemmelsen i § 18, stk. 3, 2. pkt. gælder tilsvarende.

§ *20.* Landsstýrið kann áseta reglur um gjald fyri at fáa latið upplýsingar.

§ *20.* Landsstyret kan fastsætte regler om betaling for udlevering af oplysninger.

KAPITTUL 6.

Um at lata upplýsingar til almennar myndugleikar.

KAPITEL 6.

Videregivelse af oplysninger til offentlige myndigheder.

§ *21.* Skrásettar upplýsingar kunnu latast víðari til almennar myndugleikar í tann mun, sum nevnt er í 5. kapitli, og eisini har sum hesir myndugleikar sambært lóg hava atgongd til at fáa upplýsingarnar.

2. stk. Annars er bert loyvt at lata víðari til annan almennan myndugleika, um so er, at upplýsingarnar hava stóran týdning fyri virkið hjá hesum myndugleika ella hava stóran týdning fyri avgerð, sum myndugleikin skal taka, sbr. tó § 9, stk. 1, 2. pkt. Ikki er kortini loyvt at lata upplýsingar víðari, tá ið tað er ímóti serligum reglum um tagnarskyldu, sum settar eru við lóg.

§ *21.* Registrerede oplysninger kan videregives til offentlige myndigheder i det omfang, der er nævnt i kapitel 5, samt hvor de pågældende myndigheder i henhold til lov har adgang til at få oplysningerne.

Stk. 2. I øvrigt må videregivelse kun finde sted til en anden offentlig myndighed, såfremt oplysningerne har væsentlig betydning for vedkommende myndigheds virksomhed eller har væsentlig betydning for en afgørelse, som myndigheden skal træffe, jfr. dog § 9, stk. 1, 2. pkt. Der må dog ikke videregives oplysninger i strid med særlige tavshedsforskrifter, der er fastsat ved lov.

3. stk. Frá skráum, sum einans eru gjørdar við tí í hyggju at gera hagfrøðiligar úrdráttir ella sum liður í vísindaligari kanning, er ikki loyvt uttan serliga heimild at lata upplýsingar viðari, sum kunnu vísa til ávís fólk. Skrásetingareftirlitið kann tó eftir umsókn í hvørjum einstøkum føri loyva, at slíkar upplýsingar verða latnar viðari til skráir, sum einans eru gjørdar við hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli. Avgerðin hjá skrásetingareftirlitinum um hetta kann ikki verða løgd fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.

Stk. 3. Fra registre, der udelukkende er oparbejdet med henblik på at foretage statistiske uddrag eller som led i en videnskabelig undersøgelse, må der ikke uden særlig hjemmel videregives oplysninger, der kan henføres til bestemte personer. Registertilsynet kan dog efter ansøgning i hvert enkelt tilfælde tillade, at sådanne oplysninger videregives til registre, der udelukkende er oparbejdet i statistisk eller videnskabeligt øjemed. Registertilsynets afgørelse herom kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

KAPITTUL 7.

Skrásetingareftirlitið.

§ *22.* Skrásetingareftirlitið, sum er skipað av ráði og avgreiðsluskrivstovu, hevur eftirlit við hvørjari skrá, sum lógin fevnir um. Skrásetingareftirlitið útinnir haraftrat tey størv, sum sambært lóg um privatar skráir o.a. eru løgd undir eftirlitið.

2. stk. Skrásetingareftirlitið ansar av egnum ávum ella eftir klagu frá skrásettum fólki eftir, at skráin er stovnað og verður nýtt í samsvari við lógarinnar ásetingar og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini.

§ *23.* Eftirlitið, sum landsstýrið setur, er skipað av formanni, sum skal vera løgfrøðingur, og av 2 øðrum limum, harav annar skal vera datakønur og annar hava kunnleika til fyrisiting. Limirnir og varamenn teirra verða útnevndir fyri 4 ár.

KAPITEL 7.

Registertilsynet.

§ *22.* Registertilsynet, der består af et råd og et sekretariat fører tilsyn med ethvert register, der omfattes af loven. Registertilsynet udøver endvidere de funktioner, der i henhold til lov om private registre m.v. er henlagt til tilsynet.

Stk. 2. Registertilsynet påser af egen drift eller efter klage fra en registreret, at registeret er oprettet og anvendes i overensstemmelse med lovens bestemmelser og de forskrifter, der er fastsat i medfør af loven.

§ *23.* Tilsynet, der nedsættes af landsstyret, består af en formand, der skal være jurist, og 2 andre medlemmer, hvoraf den ene skal være datakyndig og den anden have administrativ erfaring. Medlemmerne og stedfortræderne for disse udnævnes

for 4 år.

§ *24.* Landsstýrið kann áseta starvsskipan fyri eftirlitið.

§ *24.* Landsstyret kan fastsætte en forretningsorden for tilsynet.

§ *25.* Skrásetignareftirlitið kann bæði frá tí ella teimum myndugleikum, sum hava ábyrgdina av skránni, og tí, sum førir skránna, krevja allar upplýsingar, sum hava týdning fyri eftirlitið.

2. stk. Limirnir og starvsfólkið á eftirlitinum hava hvørja og eina tíð móti neyðturvuligum heimildarskjali uttan dómsúrskurð atgongd til øll høli, haðani skráin verður stýrd, ella kann nýtast, og eisini til høli, har sum skráin ella tey teknisku hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

3. stk. Skrásetingareftirlitið greiðir tí ella teimum myndugleikum, sum hava ábyrgdina av skránni, og landsstýrinum frá staðfestum brotum á lógina ella tær ásettu reglur og annars funnum brekum. Eftirlitið skal fáa at vita, hvat myndugleikarnir gera orsakað av frágreiðingini.

§ *25.* Registertilsynet kan afkræve såvel den eller de for registeret ansvarlige myndigheder som den, der fører registeret, enhver oplysning af betydning for tilsynet.

Stk. 2. Tilsynets medlemmer og personale har til enhver tid mod behørlig legitimation uden retskendelse adgang til alle lokaler, hvorfra registeret administreres eller kan benyttes, samt til lokaler, hvor registeret eller de tekniske hjælpemidler opbevares eller anvendes.

Stk. 3. Tilsynet afgiver indberetning til den eller de for registeret ansvarlige myndigheder og landsstyret om konstaterede overtrædelser af loven eller de fastsatte forskrifter samt i øvrigt om forefundne mangler. Tilsynet skal have underretning om, hvad myndighederne foretager i anledning af indberetningen.

§ *26.* Skrásetingareftirlitið kann hvørja og eina tíð fyri tí myndugleika, sum hevur ásett reglurnar, seta fram uppskot um broyting í galdandi reglum. Ásetingarnar í § 5, stk. 2 og § 6, stk. 3, 2. pkt. hava samsvarandi gildi.

§ *26.* Registertilsynet kan til enhver tid fremsætte forslag om ændring af gældende forskrifter over for den myndighed, der har fastsat forskrifterne. Bestemmelserne i § 5, stk. 2, og § 6, stk. 3, 2. pkt., gælder tilsvarende.

§ *27.* Skrásetingareftirlitið kann geva árliga almenna frágreiðing um virki sítt.

2. stk. Skrásetingareftirlitið kann annars kunngera ummæli, sum eftirlit-

§ *27.* Registertilsynet kan afgive årlig en offentlig beretning om sin virksomhed.

Stk. 2. Registertilsynet kan i øvrigt offentliggøre udtalelser, som tilsynet

ið hevur givið sambært § 5, stk. 1, § 6, stk. 3 og § 7, stk. 2, § 18, stk. 3 og § 19, stk. 2, frágreiðingar, sum givnar eru sambært § 25, stk. 3, og uppskot, sum framsett eru sambært § 26. Ásetingin í § 8 stk. 2, 2. pkt. hevur samsvarandi gildi.

har afgivet i medfør af § 5, stk. 1, § 6, stk. 3 og § 7, stk. 2, § 18, stk. 3, og § 19, stk. 2, indberetninger, der er afgivet i medfør af § 25, stk. 3, og forslag, der er fremsat i medfør af § 26. Bestemmelserne i § 8, stk. 2,2. pkt. gælder tilsvarende.

KAPITTUL 8.

Revsing.

§ 28. Uttan so at harðari revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, verður tann revsaður við bót ella hefti, sum

1) ikki aktar treytir í samtykki eftir § 16, stk. 2,

2) brýtur § 17, 3. pkt., og § 18, stk. 2, 2. pkt., ella

3) ikki aktar treytir settar sambært § 18, stk. 3 og § 19.

2. stk. Í reglum, sum verða givnar sambært kapittul 2 í lógini, kann verða ásett bót fyri at bróta ásetingar í reglunum.

3. stk. Er brotið framt av partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann bót verða áløgd felagnum í sjálvum sær.

KAPITEL 8.

Straf.

§ 28. Medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde eller hæfte den, der:

1) tilsidesætter vilkår i et samtykke efter § 16, stk. 2,

3) overtræder § 17, 3. pkt., og § 18, stk. 2, 2. pkt., eller

3) tilsidesætter vilkår fastsat i medfør af § 18, stk. 3, og § 19.

Stk. 2. I forskrifter, der udstedes i medfør af lovens kapitel 2, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelserne i forskrifterne.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan bødeansvar pålægges selskabet som sådant.

KAPITTUL 9.

Ásetingar um, nær lógin kemur í gildi og um bráðfeingisreglur v.m.

§ 29. Lógin kemur í gildi tann 1. apríl

KAPITEL 9.

Ikrafttrædelses- og overgangsbestemmelser m.v.

§ 29. Loven træder i kraft den 1. april

1982.

2. stk. Fyri skráir og skrásetingarskipanir, sum hava verið nýttar áðrenn lógin kom í gildi, fær lógin ikki avleiðingar fyrr enn eitt ár eftir at lógin kom í gildi. Fyri hesar skráir verða uppskot til reglur um gerð og rakstur av skráunum, sum lúka ásetingarnar í kap. 3-6, send inn til skrásetingareftirlitið í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at lógin fekk gildi. Ásetingarnar í § 5, stk. 2 og § 6, stk. 3, 2. pkt. hava samsvarandi gildi. Landsstýrið kann leingja um freistirnar hjá ávísum skráum.

3. stk. Fyri skráir, sum hava verið nýttar ella eru í gerð, tá ið lógin kemur í gildi, og hjá teimum tað ikki ber til uttan munandi, systemtekniskar broytingar at geva útskrift av skrásettum upplýsingum, fáa ásetingarnar í § 13, stk. 1 og 3 ikki avleiðing fyrr enn 3 ár eftir at lógin kom í gildi.

1982.

Stk. 2. For registre og registreringssystemer, der er taget i brug inden lovens ikrafttræden får loven først virkning 1 år efter lovens ikrafttræden. For de pågældende registre indsendes udkast til forskrifter om registrenes opbygning og drift, der opfylder bestemmelserne i kapitel 3-6, til registertilsynet senest 6 måneder efter lovens ikrafttræden. Bestemmelserne i § 5, stk. 2 og § 6, stk. 3, 2. pkt. gælder tilsvarende. Landsstyret kan forlænge fristerne for bestemte registre.

Stk. 3. For registre, der er taget i brug eller er under opbygning ved lovens ikrafttræden, og for hvilke det ikke uden væsentlige systemtekniske ændringer er muligt at give udskrift af de registrerede oplysninger, får bestemmelserne i § 13, stk. 1 og 3 først virkning 3 år efter lovens ikrafttræden.

Viðmerkingar:

Lógin hevur gildi fyri EDV-skráir, sum innihalda persónupplýsingar og verða førdar fyri ta almennu fyrisitingina. Hetta vil siga, at lógin er galdandi fyri EDV-skráir hjá allari almennu umsitingini í Føroyum, t.v.s. landið, kommunur og ríkið, smbr. eisini § 4, 1. stk. Haraftrat er lógin avmarkað til EDV-skráir, sum innihalda upplýsingar um fólk. Lógin fevnir sostatt um persónaskráir, t.d. fólkayvirlit og aðrar skráir, har gjørligt er at finna fram til upplýsingar um ávisar persónar, t.d. bilskráseting og aðrar ognarskráir.

Lógaruppskotið er gjørt við tilsvarandi donsku lógini nr. 294 frá 8. juli 1978 sum fyrimynd, og eru viðmerkingarnar til tær einstøku greinarnar í donsku lógini sostatt elsini vegleiðandi fyri, hvussu føroyska lógin eigur at skiljast.

Skráir, sum verða førdar fyri almennu fyrisitingina, kunnu ikki verða stovnaðar uttan góðkenning frá landsstýrinum, sum frammanundan hevur fingið sær ummæli í málinum frá skrásetingareftirlitinum. Áðrenn ein skrá verður nýtt, má gerast ein fyriskipan, ið lýkur treytirnar kapitlunum 3 - 6. Fyriskipanin fyri skránna verður góðkend av landsstýrinum, aftaná at skrásetingareftirlitið hevur ummælt málið.

Viðvíkjandi skráum, sum verða førdar fyri kommunumyndugleikar, er tað

bygdaráðið/býráðið, ið tekur avgerð um stovnan, og góðkennir fyriskipanina. Áðrenn góðkenning, eigur skrásetingareftirlitið at ummæla málið. Kann eftirlitið ikki taka undir við uppskotinum, verður málið lagt fyri landsstýrið, ið tekur endaliga avgerð.

Skráir, sum verða førdar fyri fleiri kommunur, kunnu ikki verða stovnar uttan góðkenning frá landsstýrinum.

Omanfyri nevndu reglur eru eisini galdandi fyri samkoyring av skráum.

Av tí at landsstýrið/bygdaráðið góðkenna skráir, sum verða førdar fyri ta almennu fyrisitingina, er lógin ikki bert ein lóg, ið tryggjar persónliga frælsið hjá einstaklinginum, men skal hon eisini taka hædd fyri samskipan í almennu fyrisitingini, t.d. umlegging av fólkayvirlitinum til EDV, ið verður grundarlagið undir einari komandi kelduskattaskipan.

Sum høvuðsregla mugu bert upplýsingar, ið skilliga hava týdning fyri at røkja endamálið hjá avvarðandi myndugleika EVD-skrásetast.

Fyriskipanin fyri eini skrá skal verða almennt kunngjørd. At tær upplýsingar, flokkar av upplýsingum, ið skrásettar eru, verða almennt kunngjørdar, ber í sær, at borgari hevur møguleika fyri at kanna, um hann er skrásettur í eini skrá, og um upplýsingarnar eru rætt skrásettar.

Tá upplýsingar um persónar hava mist sín týdning fyri endamálið hjá eini skrá, eiga tær at verða tiknar burtur úr skránni, fyri at forða fyri at fáa óneyðugar upplýsingar upp í rúgvu.

Til at tryggja, at rangar ella villleiðandi upplýsingar ikki verða skrásettar, eigur grundartilfarið at vera goymt í eina ávísa tíð, sum skrásetingareftirlitið ásetir. Síðani verður tað ábyrgdin hjá skrásetingareftirlitinum í sambond við umsjón at kanna eftir um tær upprunaligu, ið skrásettar eru, eru í samsvar við grundartilfarið.

Í § 9 í uppskotinum verður tilskilað, hvørjar upplýsingar kunnu skrásetast, og kunnu hesar verða býttar upp í tveir bólkar:

1. Vanligar upplýsingar, § 9, 1. stk., og er her talan um navn, bústað, føðingardagfesting, persónnummar v.m. Hesar upplýsingar eru bert loyvdar at skráseta, um tær hava nakað samband við endamálið hjá skránni.
2. Sensitivar upplýsingar, § 9, 2. stk., t.v.s. upplýsingar sum átrúnaður, ættarslag, politisk viðurskifti o.t. Hesar upplýsingar eru bert loyvdar at skráseta, um tær eru neyðugar fyri at skráin skal kunna røkja sítt endamál.

Tað er týdningarmikið at skilað verður ímillum báðar flokkar av upplýsingum. Í fyriskipanini fyri tl einkultu skránni skal verða sagt:

1. Hvørjar flokkar av upplýsingum, skráin fevnir um,
2. Hvørjar persónar, skráin fevnir um,
3. Endamálið við skránni.

Hetta ger tað møguligt hjá skrásetingareftirlitinum at avgera, um ein skrá kann góðkennast. Fyri tað fyrsta ber tað til hjá skrásetingareftirlitinum at kanna og meta um endamálið hjá skránni er í samsvar við tað endamálið, ið lógarásett er fyri viðkomandi myndugleika.

Síðani ber tað til at kanna og meta um, um samband er imillum teir persónar, ið ætlanin er at skráseta og endamálið við skránni.

Ein flokkur av upplýsingum, ið nevndur er í § 9, 2. stk., nevnligа upplýsingar um politisk viðurskifti, er tað ikki loyvt at skráseta, uttan so at hesar upplýsingar eru alkomandi hjá almenningi.

Skrásett fólk hava sum høvuðsreglu rætt til frágreiðing um tær upplýsingar, ið eru skrásettar.

Av tí at upplýsingar um persónar kunnu verða nýttar til nervan av persónligum frælsi, er tað neyðugt, at fyriskipanirnar innihalda reglur og prógv fyri identiteti, fyri at treyta, at upplýsingar verða givnar tí rætta persóninum. Tað er ikki neyðugt skrivliga at biðja um upplýsingar um seg sjálvan, men tað kann áleggjast viðkomandi at undirskriva eitt skjal. Tað at hava rætt til frágreiðing um skráseting gevur eisini rætt til at fáa at vita, at ein ikki er skrásettur.

Høvuðsuppgávan hjá skrásetingareftirlitinum er:

1. At geva ummæli í samband við stovnan og samkoyring av skráum,
2. At hava eftirlit við skráum, ið eru settar á stovn,
3. At taka avgerð í samband við at skrásett fólk ynskja at fáa at vita, hvat skrásett er,
4. At geva upplýsing til almenningin um arbeiði hjá skrásetingareftirlitinum.

Eftirlitið ansar av egnum ávum ella eftir klagu frá skrásettum fólki eftir, at skráin er stovnað og verður nýtt í samsvar við lógarinnar ásetingar og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini. Tað er tó ikki soleiðis, at eftirlitið bert skal ansa eftir, um lógin og fyriskipanin verða yvirhildnar, men skal eisini ansa eftir, at fyriskipanir, ið áður eru góðkendar, eru í samsvar við nútíðina.

Av tí at fyriskipanir skulu latast skrásetingareftirlitinum, fær eftirlitið við tíðini nóg mikið tilfar til yvirlit yvir skráir í tí almennu fyrisitingini. Hetta tilfar verður síðani nýtt sum leiðbeining, tá ið nýggj skrá skal stovnast. Haraftrat verður tilfar nýtt til upplýsing av almenninginum, jbr. § 27.

Kostnaðurin av skrásetingareftirlitinum verður mettur at vera:

Nevndarsamsýningar	28.000 kr.
Skrivaraløn	70.000 kr.
Høli, hiti v.m.	20.000 kr.
Telefon, postgjald v.m.	5.000 kr.
Aðrar útreiðslur	20.000 kr.
	143.000 kr.

1. Viðgerð 22. januar. Málið varð viðgjørt saman við tingmálunum 81 og 75. Skotið varð upp at beina málini í eina serstaka 6-manna millumtinganevnd, annað uppskot varð at beina málini í lóganevndina. Atkvøðugreiðsla 25. januar um hetta.

At málini skuldu beinast í lóganevndina fall við 3-0. Málini vórðu sostatt beind í 6-mannanevnd.

Í hesa nevnd vórðu valdir: Edmund í Garði, Jóannes Dalsgaard, Petur Reinert, Fredrik Olsen, Adolf Hansen og Eli Nolsøe.

Málið ikki afturkomið úr nevndini.

Víst verður til uppskotið til samtyktar í álitinum í løgtingsmáli nr. 75/1981: Fólkayvirlit.

F.L. j.nr. 535-1.

---

75. Fólkayvirlit.

Ár 1981, týsdagin 15. december legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lóg um fólkayvirlit.

§ *1.* Kommunalu fólkayvirlitini verða førd eftir fyriskipan frá Bygda(r)-ráðunum. Útreiðslurnar av at føra tey bera kommunurnar.

2. stk. Reglur um, hvussu yvirlitini skulu førast, um eftirlit við hesum og um samarbeiði teirra sínámillum verða settar av landsstýrinum. Landsfólka-yvirlitið fær heimild at geva hvørjum fólki eitt persónsnummar. Landsstýrið setir eisini reglur um atgongd til at fáa upplýsingar frá yvirlitunum og um gjald fyri hetta.

lov om folkeregistre.

§ *1.* De kommunala folkeregistre føres ved kommunalbestyrelsens foranstaltning. Udgifterne ved registrenes førelse påhviler kommunerne.

St. 2. Regler om registrenes førelse og om tilsyn hermed samt om registrenes indbyrdes samarbejde fastsættes af landsstyret. Landsfolkeregisteret bemyndiges til at give hver person et personnummer. Landsstyret fastsætter tillige regler om adgangen til at få oplysninger fra registrene samt om betalingen herfor.

§ 2. Landsfólkayvirlitið verður ført eftir fyriskipan frá landsstýrinum.

2. stk. Gjøllari reglur um, hvussu yvirlit skal førast og nýtast eins og gjald fyri hetta, setir landsstýrið.

3. stk. Fólkayvirlitini hjá kommununum hjálpa til at umsita landsfólkayvirlitið á tann hátt, landsstýrið ásetir.

§ 3. Frá landsfólkayvirlitinum og kommunala fólkayvirlitinum kunnu privat fólk og virki o.o., sum frammanundan fyri skrámti kunnu sanna, hvør ávist fólk er, fáa hesar upplýsingar um hetta fólk:

1) Navn
2) Yrki
3) Bústað, uttan so hesin er vardur
4) Upplýsing um, at fólk hevur mist sjálvræði, er deytt, horvið ella flutt av landinum.

2. stk. Aðrar upplýsingar um fólk, sum tað frammanundan er sannað, hvør er, kunnu einans verða latnar privatum, um hetta fólk ella virki o.o. kunnu prógva, at tað hevur rættarligan týdning fyri tey at fáa ta umbidnu upplýsing.

3. stk. Við trcytum, sum verða lagdar við í hvørjum einstøkum føri, kann fyri samsýning verða loyvt, at vinnufyritøkur frá landsfólkayvirlitinum ella kommunala fólkayvirlitinum fáa tær í fyrsta stykki tilskilaðu upplýsingar (dátur) ella aftratkomandi broytingar í hesum viðvíkjandi avmarkaðum tali av fólkum, sum tað frammanundan hevur verið sannað fyri fólkayvirlitinum hvørji tey eru,

§ 2. Landsfolkeregistret føres ved landsstyrets foranstaltning.

Stk. 2. De nærmere regler om registrets førelse og udnyttelse samt betalingen herfor fastsættes af landsstyret.

Stk. 3. De kommunale folkeregistre medvirker til vedligeholdelsen af landsfolkeregistret på den af landsstyret fastsatte måde.

§ 3. Fra landsfolkeregisteret og de kommunale folkeregistre kan til private personer og virksomheder m.v., der forud overfor registret kan identificere en bestemt person, videregives følgende oplysninger om vedkommende person:

1) Navn
2) Stilling
3) Adresse, med mindre denne er beskyttet
4) Oplysning om, at personen er umyndiggjort, afgået ved døden, forsvundet eller udvandret af landet.

St. 2. Andre oplysninger om en forud identificeret person kan kun videregives til private, såfremt vedkommende person eller virksomhed m.v. kan godtgøre at have retlig interesse i at få den pågældende oplysning.

Stk. 3. På vilkår, der fastsættes i hvert enkelt tilfælde, kan der mod vederlag gives tilladelse til, at erhvervsvirksomheder fra landsfolkeregistret eller de kommunale folkeregistre får de i stk. 1 angivne data eller løbende ændringer i disse for en større afgrænset kreds af personer, der enkeltvis forud er identificeret over for registret. Forinden sådan tilladelse gives, skal der indhentes en udtalelse

hvørt einsæris. Áðrenn slíkt loyvi verður givið, skal ummæli fáast frá tí skrásetingareftirliti, sum umrøtt er í lóg um evnisskrár hjá almennum myndugleikum. Loyvið kann eina og hvørja tíð verða tikið aftur. Tað er treyt, at upplýsingarnar hert skulu nýtast í ávísum rættarumstøðum og ikki til at stovna viðurskifti, sum ikki eru til frammanundan, og eisini at fingnar upplýsingar er einans loyvt at lata víðari til privat fólk ella aðrar vinnufyritøkur, um hetta beinleiðis er sett í treytunum. Í treytunum skulu annars vera settar gjøllari treytir fyri útflýggjan og nýtslu av upplýsingum og eisini fyri gjald fyri hetta.

§ 4. Eftir reglum, sum landsstýrið setir, skulu almennir myndugleikar geva fólkayvirlitinum og landsfólkayvirlitinum upplýsingar.

§ 5. Hvør tann, sum flytur, skal innan 5 dagar eftir flutning boða fólkayvirlitinum frá hesum. Fráboðanin skal eisini hava tey húsfólkini við, sum somulciðis flyta.

2. stk. Landsstýrið kann seta reglur um, at ásetingin í stk. 1 eisini skal galda fyri fólk, sum drúgva tíð hava tilhald í aðrari kommunu enn bústaðarkommununi.

§ 6. Fólkayvirlitið kann áleggja hvørjum húsaeigara ella leigara, áðrenn tann freist er liðin, sum nevnd er í § 5, at boða fólkayvirlitinum frá, hvør ið flytur til ella frá íbúð ella húsum hansara. Henda skylda er tó ikki galdandi, um tann, sum flytur, fra det i lov om offentlige myndigheders registre omhandlede registertilsyn. Tilladelsen kan til enhver tid tilbagekaldes. Det er en betingelse, at oplysningerne udelukkende skal bruges i konkrete retsforhold og ikke til etablering af relationer, som ikke eksisterer i forvejen, samt at modtagne oplysninger kun må videregives til private personer eller andre erhvervsvirksomheder såfremt det udtrykkeligt er fastsat i vilkårene. I vilkårene skal i øvrigt fastsættes de nærmere betingelser for udleveringen og brugen af oplysninger samt betalingen herfor.

§ 4. Efter regler, der fastsættes af landsstyret, skal offentlige myndigheder meddele oplysninger til folkeregistrene og landsfolkeregistret.

§ 5. Enhver, der flytter, skal inden 5 dage efter flytningen foretage anmeldelse herom til folkeregistret. Anmeldelsen skal tillige omfatte de medlemmer af husstanden, der flytter med.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte regler om, at bestemmelsen i stk. 1 også skal gælde for personer, der tager ophold i en anden kommune end bopælskommunen for en længere tid.

§ 6. Folkeregistret kan pålægge enhver husejer eller lejer inden udløbet af den frist, der er nævnt i § 5, at meddele registret oplysninger om, hvem der flytter til eller fra hans ejendom eller lejlighed. Et sådant pålæg gælder dog ikke med hensyn til flyttende, der har

hevur víst avvarðandi húsacigara ella leigara kvittan frá fólkayvirlitinum fyri at hava boðað frá búflutningi, sum nevnt í § 5.
2. stk. Fyriskipan eftir stk. 1 kann eisini verða givin stjórnum á háskúlum og tílíkum.

§ 7. Eru fráboðanir eftir § 5 ikki nóg góðar, neyvar ella ósambariligar, kann fólkayvirlitið krevja, at fráboðarin sjálvur gevur tí, ið yvirlitið førir, frágreiðing og fyri egnu rokning útvegar tær váttanir v.m., sum neyðugar eru til at greiða málið.

§ 8. Skuldi fólkayvirlitið heilt ella fyri ein part, farist ella verðið ónýtiligt, kann kommunan áleggja teimum fólkum, sum hava bústað ella tilhald í kommununi, at geva tær upplýsingar, sum neyðugar eru til at fáa yvirlitið aftur í lag.

§ 9. Gjøllari reglur fyri tær í §§ 5, 6 og 8 umrøddu fráboðanir verða settar av landsstýrinum.

§ *10.* Tann, sum nýtir ella letur víðari upplýsingar ímóti § 3, stk. 3, 4. pkt. ella brýtur treytir, sum eru settar í loyvið sambært § 3, stk. 3, 1. pkt. verður revsaður við bót uttan so at lóggávan annars krevur harðari revsing.

2. stk. Tann, sum brýtur ásetingina í § 5 ella ikki aktar fyriskipan eftir §§ 6-8 verður revsaður við bót. Á sama hátt verður tann revsaður, sum gevur fólkayvirlitinum rangar upplýsingar.
3. stk. Í reglum, sum gjørdar verða

forevist vedkommende husejer eller lejer kvittering fra folkeregistret for, at de har foretaget anmeldelse som nævnt i § 5.
Stk. 2. Pålæg efter stk. 1 kan også gives ledere af højskoler og lignende.

§ 7. Såfremt anmeldelser efter § 5 er ufyldestgørende, unøjagtige eller indbyrdes modstridende, kan vedkommende folkeregister pålægge anmelderen at afgive personlig forklaring til registerføreren og for egen regning fremskaffe de til sagens oplysning nødvendige attester m.v.

§ 8. Hvis et folkeregister helt eller delvis går til grunde eller gøres ubrugeligt, kan kommunen pålægge de personer, der har bopæl eller ophold i kommunen, at meddele de oplysninger, der er nødvendige til registrets genoprettelse.

§ 9. De nærmere regler for afgivelsen af de i §§ 5, 6 og 8 omhandlede meddelelser fastsættes af landstyret.

§ *10.* Den, der bruger eller videregiver oplysninger i strid med § 3, stk. 3, 4. pkt. eller overtræder vilkår fastsat i tilladelse i henhold til § 3, stk. 3, 1. pkt., straffes med bøde, medmindre højere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning.
Stk. 2. Den, der overtræder bestemmelsen i § 5 eller tilsidesætter pålæg efter §§ 6-8 straffes med bøde. På samme måde straffes den, der afgiver urigtige oplysninger til folkeregistret.
Stk. 3. I forskrifter, der udfærdiges i

sambært lógini, kann bót verða ásett fyri at bróta ásetingar í reglunum.

4. stk. Fyri brot, partafeløg, lutafeløg ella tilik gera, kann verða álagt felagnum í sjálvum sær bót.

henhold til loven, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.
Stk. 4. For overtrædelser, der begås af aktieselskaber, andelsselskaber, anpartsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bøde.

§ *11.* Í málum um brot á § 5, um óvirðing fyri fyriskipan eftir § 6 og brot á reglur, sum í sambandi §§ 5 og 6 eru ásettar sambært § 9, kann bygda(r)ráðið í teirri kommunu har sum avvarðandi býr ella heldur til, gera honum kunnugt, at málið kann gerast av við tað, at hann til kommununa rindar eina bót, tó ikki størri enn 600 kr.

§ *11.* I sager om overtrædelse af § 5, tilsidesættelse af pålæg efter § 6 og overtrædelse af forskrifter, der i tilknytning til §§ 5 og 6 er fastsat i henhold til § 9, kan kommunalbestyrelsen i den kommune, hvor den pågældende bor eller opholder sig, tilkendegive ham, at sagen kan afgøres ved, at han til kommunen betaler en bøde, dog ikke over 600 kr.

§ *12.* Landsstýrið kann gera av, at reglurnar í §§ 5-7 og 10-11 eisini skulu galda fyri fólk, sum flytur til ella burtur úr Føroyum, við teimum frávikum, sum tey serligu viðurskifti í sambandi við tílíkar flytingar mæla til.

§ *12.* Landsstyret kan bestemme at reglerne i §§ 5-7 og 10-11 også skal gælde personer, der flytter til og fra Færøerne med de afvigelser, som de særlige forhold i forbindelse med sådanne flytninger tilsiger.

§ *13.* Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1982. Løgtingslóg nr. 23 frá 31. mars 1949 um fólkayvirlit, sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 19. august 1949, verður samstundis avtikin.
2. stk. Reglur, sum givnar eru sambært teirri lóg, sum nevnd er í stk. 1, verða verandi í gildi til tær verða avtiknar ella broyttar sambært hesi lóg. Brot á slíkar reglur verða revsað við bót. Reglan í § 11 verður at nýta samsvarandi.

§ *13.* Denne lov træder i kraft 1. april 1982. Lagtingslov nr. 23 af 31. marts 1949 om folkeregistre som ændret ved lagtingslov nr. 45 af 19. august 1949 ophæves samtidig.
Stk. 2. Bestemmelser, der er udstedt i medfør af den i stk. 1 nævnte lov, forbliver i kraft, indtil de ophæves eller ændres i medfør af denne lov. Overtrædelse af sådanne bestemmelser straffes med bøde. Bestemmelsen i § 11 finder tilsvarende anvendelse.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg um fólkayvirlit er løgtingslóg nr. 23 frá 31. mars 1949, sum broytt

við løgtingslóg nr. 45 frá 19. august 1949.

Eftir hesi lóg vóru fólkayvirlitini í kommununum sett á stovn. Útreiðslurnar av at føra kommunalu fólkayvirlitini verða goldnar úr landskassanum, og í løtuni verður goldið kommununum ella teimum kommunalu manntalsskrivarunum knappar 3 kr. fyri hvønn íbúgva.

Alt arbeiðið hjá fólkayvirlitinum er nú samskipað gjøgnum landsfólkayvirlitið, sum landið rekur.

Arbeiðið hjá landsfólkayvirlitinum byggir tó ikki á nakra lógarheimild, og landsfólkayvirlitið er heldur ikki nevnt í løgtingslógini frá 1949 um fólkayvirlit.

Eftir fyriliggjandi uppskoti verða tey kommunalu fólkayvirlitini førd eftir fyriskipan frá kommununum, eins og kommunurnar bera útreiðslurnar. Landsfólkayvirlitið verður heimilað í lógini, eins og landsfólkayvirlitið fær heimild at geva hvørjum persóni eitt persónnummar.

Lógin er annars tilevnað sum ein rammulóg, har nærri reglur um, hvat yvirlitini skulu innihalda, og hvussu tey skulu førast, verða ásettar í serstakari kunngerð.

Viðvíkjandi heimildini at kunna geva hvørjum persóni eitt persónnummar er at viðmerkja, at tá ið nógv fólk skal skrásetast, er tað týdningarmikið at kunna nýta eitt eintýtt nummar fyri at tryggja, at tann rætti persónurin verður funnin fram. Hetta hevur týdning bæði fyri fyrisitingina og tann einstaka persónin og tryggjar, at upplýsingar ikki verða latnar til tann skeiva persónin.

Um ein kelduskattaskipan skal virka, er ein av treytunum, at broytingar í persónsupplýsingum eru rættar, og skal fráboðanarskipanin verða gjørd við edv, verður mett, at tað er neyðugt, at hvør persónur hevur eitt eintýtt nummar.

Ætlanin er, at persónnummarið skal hava 9 tøl, har tey 6 fyrstu tølini vísa føðingardag hjá viðkomandi. Tey 3 seinastu tølini eru sjálvt persónnummarið. Í hesum trimum seinastu tølunum eru eisini innbygdar upplýsingar, soleiðis at tey fyrstu tølini vísa føðingarøld, og seinasta talið vísir, um ein er kvinna ella maður, ávíkavist um talið er óstakt ella stakt.

Fólkayvirlit, sum verða umløgd til edv, koma undir eftirlit av skrásetingareftirlitinum sambært lógina um almennar skráir.

1. viðgerð 22. januar. Málið viðgjørt saman við tingmálunum 74 og 81. Skotið varð upp at beina málini í eina serstaka 6-manna millumtinganevnd, annað uppskot varð at beina málini í lóganevndina. Atkvøðugreiðsla 25. januar um hetta. At málini skuldu beinast í lóganevndina fall við 3-0. Málini vórðu sostatt beind í 6-mannanevnd.

Í hesa nevnd vórðu valdir: Edmund í Garði, Jóannes Dalsgaard, Petur Reinert, Frederik Olsen, Adolf Hansen og Eli Nolsøe.

23. apríl legði nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

í

Løgtingsmáli nr. 75/1981: Fólkayvirlit.
Løgtingsmáli nr. 74/1981: Lóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum.
Løgtingsmáli nr. 81/1981: Løgtingslóg um privatar skráir v.m.

Málini eru øll framløgd av landsstýrinum og vórðu við 1. viðgerð 22. januar 1982 beind í edv-tingnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt øll málini undir einum, men er nevndarviðgerðin bert liðug av uppskotinum til nýggju lógina um fólkayvirlit.

Galdandi lóg um fólkayvirlit er løgtingslóg nr. 23 frá 31. december 1949, sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 19. august 1949.

Lógin er galdandi fyri kommunalu fólkayvirlitini. Landsfólkayvirlitið, sum landið rekur, er ikki skipað við heimild í nøkrum lógarreglum.

Í samband við at ætlanin er at umleggja skattaskipanina til samtíðarskatt, sum skal dataviðgerðast við landsfólkayvirlitinum sum grundarlag, hevur landsstýrið mett tað neyðugt at broyta lógina um fólkayvirlit soleiðis, at hon eisini fevnir um landsfólkayvirlitið og at heimild verður fingin til at geva hvørjum persóni eitt persónnummar.

Undir 1. viðgerð av málinum og undir viðgerðini í nevndini hevur spurningurin um innføring av persónnummari, samstundis sum ætlanin er at umleggja landsfólkayvirlitið til data-viðgerð, verðið tann spurningur, ið hevur verið mest umrøddur.

Nevndin hevur undir viðgerðini fingið frágreiðing frá umboðutn fyri data-feløg, arbeiðsbólkinum, ið arbeiðir við uppskoti til kelduskattaskipan, Føroya Kommunufelag og landsstýrismanninum í figgjarmálum.

Umboðini fyri Elektron, sum hevur havt útskrivingina av landsskattinum um hendi síðan 1978, upplýsti, at tað longu síðan byrjanina hevur verið tosað um at fáa eitt eintýtt nummar fyri hvønn persón, sum hevði verið hent, av tí at so nógvir persónar hava sama navn, umframt at navnið hjá sama persóni kann verða skrivað uppá nógvar mátar. Um ein hugsar um samtíðarskatt, meintu teir eisini, at tað er avgjørt neyðugt við einum persónnummari. T.d. hava nógvir føroyingar ofta fleiri arbeiðisgevarar, og gevur hetta nógvar inngjaldingar. Bert at taka inngjaldingina eftir navni, kemur ongantið at geva eina álítandi inngjalding. Ein eigur eisini, at tonkja uppá tey fólk, ið skulu geva eitt nummar upp fyri sínum arbeiðsgevara, og tá er eitt persónnummar lættast at minnast. Higartil hevur Elektron í samband við skattaútskrivingina nýtt eitt nummar við 13 siffrum, sum tó ikki loysir allar spurningar. Tað var tó gjørligt at leggja sín teknikk eftir, um persónnummar verður ella ikki.

Umboðini fyri P/F Data upplýstu, at teir nú nýta føðingardato og eitt fortleypandi nummar. Teir hildu tað ikki vera neyðugt við nøkrum persónnummari, tí teir

longu frammanundan høvdu allar føðingardatoir hjá teimum, sum vóru í yvirlitinum. P/F Data umsitur allar landskassalønir, almannaveitingar og skatt.

Umboðini fyri bæði datafelagini vóru samd um, at tað verður umleið 50% dýrari at umsita eina kelduskattaskipan við ongum persónnummari.

Umboðini fyri Com-Data greiddu frá, at tá ein skal avgreiða stórar nøgdir sentralt, er neyðugt við einum eintýddum nummari. Annars má ein desentralisera, so ein kennir fólkini. Annars mettu teir tað vera skeivt at leggja eina sentrala skrá hjá einum privatum virki.

Limirnir í kelduskattabólkinum upplýstu, at við einari kelduskattaskipan var neyðugt at data-skráseta allar skattgjaldarar og harvið umleggja landsfólkayvirlitið til EDV-skrá. Fyri at kunna identifisera skattgjaldararnar, er tað avgjørt neyðugt við einari nummarskipan við tilknýti til føðingardag og eitt tal. Teir hildu tað ikki bera til bert at nýta eitt loypinummar aftrat føðingardegnum. Teir mettu eisini, at persónnummarið ómakar fólkið minst, tí tað verður bert neyðugt at minnast tey 3 seinastu tølini. Transaktiónirnar við eini kelduskattaskipan eru so stórar, at tað er neyðugt við einari eintýddari skipan.

Leiðarin av landsfólkayvirlitinum hevur víst nevndini, hvat verður skrásett í landsfólkayvirlitinum og upplýsti hann, at aftaná umleggingina til EDV er bert ætlanin at skráseta tað, sum verður skrásett í dag + persónnummarið.

Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, hevur fyri nevndini lagt áherðslu á, at tað er av stórsta týdningi at fáa lógina um landsfólkayvirlit samtykta, fyri at tíðarfreistin fyri at kunna innføra kelduskatt frá 1. januar 1984 kann halda

Ein meiriluti í nevndini (Edmund í Garði, Frederik Olsen og Eli Nolsøe) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um fólkayvirlit við hesum

BROYTINGARUPPSKOTI

1) Í lógaryvirskriftini verður »lóg« broytt til »løgtingslóg«.
2) Í § 3 gongur stk. 3 út.
3) Í § 10 gongur stk. 1 út, og stk 2-4 verða ávikavist stk. 1-3.
4) Óbroytt.

5) Í § 11 verður orðið »bót« broytt til »upphædd«.
6) Í § 12 verða orðini »sum flyta til ella burtur úr Føroyum« broytt til »sum flytir til Føroyar ella burtur úr Føroyum«.
7) Í § 13 verða orðini »1. april 1982« broytt til »1. juli 1982«.

1) I lovens overskrift ændres »lov« til »lagtingslov«.
2) I § 3 udgår stk. 3.
3) I § 10 udgår stk. 1 og stk. 2-4 ændres til henholdsvis stk. 1-3.
4) I § 10, stk. 4 udgår ordet »anparts-selskaber«.
5) I § 11 ændres »en bøde« til »et beløb«.
6) Uændret.

7) I § 13 ændres ordene »1. april 1982« til »1. juli 1982«.

Tá nevndin sum frammanundan umrøtt ikki hevur fingið viðgjørt málini um almennar skráir og privatar skráir liðug áðrenn tingsetan endar, loyvir nevndin sær at skjóta upp, at hon heldur fram við viðgerðini av hesum málum og setir sostatt fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Tann av tinginum setta serliga tingnevnd til viðgerð av EDV-lógunum heldur fram sum millumtinganevnd til ólavsøkutingsetuna til viðgerð av løgtingsmáli nr. 74/1981 um skráir hjá almennum myndugleikum og tingmál nr. 81/1981: Privatar skráir.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) vísir á, at lógaruppskotini um fólkayvirlit, almennar og privatar skráir, øll trý hanga saman. Tað má tí metast at vera skeivt at fremja lógina um fólkayvirlit nú, meðan bíðað verður eftir eftirlitslógum til ólavsøku.

Minnilutin vísir á, at tað enn standa nógvir ógreiðir og illa upplýstir spurningar eftir í hesum máli. Tað er t.d. enn ikki greitt, hvat persónnummarið kemur at merkja í longdini og heldur er ikki greitt, um tað yvirhøvur er avgerandi neyðugt við einum persónnummari.

Eisini metir minnilutin, at vandi kann vera fyri, at allur spurningurin um eftirlit við EDV-skráseting dettur niður fyri, um lógaruppskotið um fólkayvirlit byggjandi á persónnummar verður framt fyri seg og eftirlitslóggávan fyri seg.

Tað eigur eisini at verða havt í huga, at tann serliga EDV-nevndin, enn ikki hevur havt fund við allar avvarðandi stovnar og einstaklingar, eins og nógvir tekniskir spurningar enn ikki eru upplýstir fyri nevndini.

At enda skal minnilutin vísa á ta ivasomu mannagongd í øllum EDV-spurningum, har tað tykist sum landsstýrið hevur tilætlað eina samanblanding av almennum og privatum áhugamálum, sum ikki kann góðtakast.

Út frá hesum metir minnilutin, at løgtingsmálið um fólkayvirlit eigur at verða liðugt viðgjørt og avgreitt saman við tingmáli nr. 74 og nr. 81, uppskot um almennar og privatar skráir, og setir tí fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Tann av tinginum setta serliga tingnevnd til viðgerð av EDV-lógunum heldur fram sum millumtinganevnd til ólavsøkutingsetuna til viðgerð av løgtingsmáli nr. 74 um skráir hjá almennum myndugleikum, tingmál nr. 81 um privatar skráir og tingmál nr. 75 um fólkayvirlit.

Til løgtingsmál nr. 75/1981: Fólkayvirlit hevur minnilutin Adolf V. Hansen hesar viðmerkingar:

Minnilutin (Adolf V. Hansen) kann sum heild taka undir við uppskoti landsstýrisins og broytingum meirilutans, men kann ikki taka undir við 2. punktum í 2. stk. av § 1 (persónnummar) og setir til landsstýrisuppskotið fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1, stk. 2 ganga út orðini: »Landsfólkayvirlitið fær heimild at geva hvørjum fólki eitt persónnunumar«.

I § 1, stk. 2, udgår ordene: »Landsfolkeregistret bemyndiges til at give hver person et personnummer«.

Hetta verður gjørt við fylgjandi viðmerkingum og grundgevingum:

Í juli 1966 stóðu hesi skilaorð, søgd av Louis Brandeis, í Det Bedste: »Når regeringsmagten fremsætter forslag, der virker godgørende, skal man erfaringsmæssigt være mest på vagt for at værne friheden.«

CPR-nummarið kemur, um tað verður samtykt, at skerja frælsið, kanska ikki so nógv í byrjanini, men sum tíðin líður, verður persónsnummarið ein reiðskapur í hondunum á myndugleikunum og peningavaldinum til at hava tað fullkomna eftirlit við einstaklinginum og øllum tí, ið hann fyritekur sær. Ikki so mikið sum eitt gjald fer at kunna fara fram uttan at lands- og peningavaldið veit tað.

2. vigerð 27. apríl. Uppskotið frá minnilutanum í nevndini (Petur Reinert og Jóannes Dalsgaard) fall við 13-0, broytingaruppskot frá minnilutanum (Adolf Hansen) § 1, 2. stk. fall við 12-0. Broytingaruppskot frá meirilutanum til pkt. 1, § 3, § 10, § 10 í danska tekstinum, § 11, § 12 og § 13 øll samtykt við 18-0 atkvøðum. Landsstýrisins uppskot soleiðis broytt § 1, 1. stk. samtykt við 18-0, § 1, 2. stk. við 17-0 og § 2 til og við 13 við 18-0 atkvøðum.

28. apríl legði Adolf Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1, 2. stk., 2. punktum verður lagt aftarat til seinast:

»um ein meiriluti av teimum luttakandi í eini fólkaatkvøðu fyriskipað av landsstýrinum atkvøður fyri hesi heimild.«

»såfremt et flertal af de deltagende i en folkeafstemning tilrettelagt af landsstyret stemmer for denne bemyndigelse.«

3. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot til § 1, 2. stk. fall við 9-0. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17 atkvøðum fyri og 13 ímóti.

F.L.j.nr. 314-20 Lóg nr. 86 frá 1. juni 1982.

---

76. Undirgrund og havbotnur

Ár 1981, týsdagin 15. desember legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Av tí, at løgmaður á opnum tingfundi fríggjadagin 11. í hesum kallaði samtykt løgtingsins 17. apríl 1975 viðvíkjandi yvirtøku av málsøkinum undirgrund og havbotnur ábyrgdarleysa, ið niðurbreyt virðingina fyri Føroya løgtingi, og av tí, at samráðingar landsstýrisins við donsku ríkisstjórnina um hetta mál standa fyri durum, tekur løgtingið málið til viðgerðar nú beinanvegin.

1. viðgerð 16. desember. Málið varð viðgjørt og avgreitt.

---

77. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1982

Ár 1981, týsdagin 15. december legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu semju dagf. 8. dec. 1981 um sínámillum fiskirættindi í 1982 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR).

Viðmerkingar:

Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvi til at reka svartkjaftaveiðu í føroyskum sjógvi. Frá føroyskari síðu hevur í hesum sambandi dentur verið lagdur á, at svartkjaftastovnurin undir Føroyum hevur kunnað tolað hesa veiðu, at fiskifør úr DDR frammanundan høvdu rikið hesa veiðu á hesum havleiðum, at veiðan varð viðgjørd til mannaføði, og at myndugleikarnir í DDR buðu sær til at geva frá sær vitan um veiðu og hagreiðing av svartkjafti v.m.

Týska Demokratiska Lýðveldið hevur alla tíðina ynskt um eina langtíðaravtalu við Føroyar um fiskiskap, men frá føroyskari síðu hevur verið hildið best at bíða við hesum, inntil greiða fekst á, um ein slík avtala varð til nóg mikið gagn fyri Føroyar. Her var serliga hugsað um, at tað ikki tóktist at vera føroyskur áhugi fyri fiskiskapi í eysturtýskum fiskiveiðuøki í Eystarasalti.

Í 1980 byrjaði føroyskur toskafiskiskapur í Eystarasalti, og varð tá sett sum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lýðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp í 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu upp á 6.600 tons av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið varð samstundis hækkað úr 2 til 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroy-

ingum hækkað úr 3 til 5. Av kvotuni uppá 800 tons av toski kundu 400 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 600 tons av sild.

Á fundi í Rostock tann 8. december 1981 ímillum umboð fyri Føroya Landsstýri og danska uttanríkismálaráðið øðrumegin og umboð fyri fiskivinnumyndugleikarnar hjá DDR hinumegin varð funnið fram til hjáløgdu semju um sínámillum fiskiskap millum Føroyar og DDR fyri alt árið 1982.

Sambært hesa semju verður kvotan av svartkjafti hækkað úr 6.600 tons til 8.000 tons. Loyvda skipatalið sama sum í 1981 3.

Føroyska toskakvotan verður samstundis hækkað úr 800 tons til 975 tons. Av tí hækkaðu kvotuni kunnu 500 tons av toski verða skift um við sild í lutfallinum 2 - 3, t.e. upp í 750 tons av sild. Talið av føroyskum skipum verður samstundis hækkað úr 5 til 7.

Partarnir vilja royna at gjøgnumføra notu-skifti áðrenn 30. dec. 1981 og at byrja samrøður um sínámillum fiskiskap í 1983 ella í longri tíðarskeið í oktober 1982.

Skjal 1

Umseting

PROTOKOLL

ímillum umboð fyri føroyskar og danskar myndugleikar øðrumegin og umboð fyri V.E.B. Fischkombinat Rostock hinumegin um fiskiskapin í árinum 1982.

Samráðingarnevndirnar samdust um at mæla myndugleikum teirra til at góðtaka fylgjandi uppskot:

1. V.E.B. Fischkombinat Rostock fær í árinum 1982 eina kvotu av svartkjafti uppá 8.000 t. á fiskiøki Føroya.

2. Føroyar fáa á fiskiøki DDR í 1982 eina kvotu uppá 975 tons av toski, harav møguligt er í staðin fyri upp til 500 tons av toski av hesi kvotu at fiska upp til 750 tons av sild.

3. Talið av skipum, ið kunnu gera nýtslu av kvotuni á fiskiøki Føroya, er avmarkað til 3 før.
   Føroyar kunnu til nýtslu av kvotuni á fiskiøki DDR nýta 7 før.

4. Partarnir stremba ímóti at fremja boðskrivaskifti til váttan av avtalunum um fiskiskapin í 1982 áðrenn 30.12.1981. Semja er um, at fiskiskapurin frá báðum síðum eigur at kunna byrja 1. januar 1982.

5. Partarnir meta tað hóskandi at royna at fáa í lag ráðleggingar um sínámillum fiskiskap í 1983, ella fyri longri tíðarskeið, í oktober 1982.

Rostock, tann 8. december 1981

PE/HN HB

1. viðgerð 15. december. Frávik í tíðarfreistini varð givið. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 16. december legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 15. december, og undir 1. viðgerð sama dag varð tað beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Svend Aage Ellefsen, Jógvan Olsen, Jørgen Thomsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Finnbogi Isaksen) mælir til, at málið fær regluliga viðgerð í tinginum, so lutfallið millum tað, vit fáa og tað vit lata, eftir hesum sáttmála verður gjølliga kannað.

Eftir okkara hugsan eigur munur at verða gjørdur á svartkjafti, fiskaður til matna og svartkjafti fiskaður til ídnað, tá svartkjaftur er partur í sáttmála við onnur lond.

Í hesum føri er munur í milliónum kr. millum tað, vit lata og tað, vit fáa.

2. viðgerð 16. december. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-3.

78. Veðhald fyri lánum til M/tr. »Gullfinnur«

Ár 1981, mikudagin 16. december legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum í m/tr. »Gullfinnur«.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri 1. og 2. prioritetslánunum í m/tr. »Gullfinnur«.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån i m/tr. »Gullfinnur«.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for 1. og 2. prioritets lånene i m/tr. »Gullfinnur«.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar;

1. Í løgtingsmáli nr. 3/1980 (vetrarting): Broyting í lógini um endurnýgging av fiskiskipaflotanum fekk landsstýrið heimild til eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar í heilt serligum førum landskassans vegna at veðhalda fyri prioritetslánum uppá hægst 20% av keypsprísinum fyri skip, ikki eldri enn 2 ár, tá talan er um veruliga nýskapan í veiðu- ella viðgerðarhættum ella útvegan av veiðiorku til givnar fiskimøguleikar, ið ikki verða nýttir til fulnar. Lógarbroytingin hevur gildi til 31. december 1981.

Vanliga veðhaldsheimildin er eftir lógini ætlað fyri lán til nýbygningar. Til hetta sigur landsstýrið m.a. í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at tíðin er helst ikki komin til, at hitt almenna fyri sín part leggur megindentin á at fremja útskiftingar í fiskiskipaflotanum við keyp av brúktum skipum. Hinvegin eru skip til troling á djúpum vatni, í svartkjaftaveiðu og til viðgerð av svartkjafti til matna kostnaðarmikil at byggja, helst út við 80 mió. kr.

Tá ið málið varð lagt fyri løgtingið, vóru samráðingar um at keypa skip til tílíka veiðu, útgjørt til trol- og nótaveiðu við stórari frystiorku og verksmiðju til viðgerð av iðnaðarfiski.

Skipið, ið talan var um, var norski stórtrolarin »Siljo«, nú »Gullfinnur«.

2. »Gullfinnur« varð keyptur av p/f Vestur, Vestmanna fyri um 40 mió. kr. og skrásettur í Føroyum 21. januar 1981. Keypið varð fíggjað soleiðis:

1. prioritet Norsk Skibshypotekbank	14.718.000 kr.
2. prioritet Låneinstitut for Skipsbyggere	6.471.000 kr.
3. prioritet Stærkodder, Noreg	7.707.000 kr.
4. prioritet Handelsbank Luxembourg við landskassaveðhaldi	4.762.000 kr.
5. prioritet Handelsbank Luxembourg við landskassaveðhaldi	4.124.000 kr.
6. prioritet Stærkodder, Noreg	883.000 kr.
	38.665.000 kr.

Restin varð fíggjað við eginpeningi, ið var 5.332.000 kr. Síðani hevur felagið fingið veðhald fyri 1.500.000 kr. í kreppuláni.

3. Eftir rokanskapinum hevur skipið 1. hálvár 1981 havt 2,3 mió. kr. í rakstrarhalli áðrenn avskrivingar og 3. kvartal 1,3 mió. kr. eisini í rakstrarhalli, t.v.s. eitt samlað rakstrarhall pr. 30. september uppá 3,6 mió. kr. áðrenn avskrivingar (avdrátt).

4. Í rentu og avdrátti uppá 1. og 2. prioritetirnar eru av juli termin falnar 2,3 mió. kr., og í januar falla av somu prioritetum 2,2 mió. kr. Felagið sær seg sum er ikki fört at gjalda hesar terminir ella terminir av øðrum lánum.

1. og 2. prioritetshavararnir hava sagt landsstýrinum frá, at hóast tað, at landsstýrið kanska við serlánum skuldi loyst felagið frá terminsskuldini frá juli 1981 og januar 1982, hevur skipið ikki møguleikan at renta og rinda skuldina aftur. Panthavararnir vilja tí, um teir ikki nú fáa onkra endaliga loysn, annaðhvørt sum banka- ella landskassaveðhald, halda fram við tvingsilsinnheintingini, ið nú er byrjað.

5. Landsstýrisins støða er, at trolarin ikki enn veruliga hevur fingið roynt, hvørja møguleikar hann hevur í tí veiðu, hann er ætlaður til. Óhapp hava verið, ið hava tarnað fiskiskapinum í bestu veiðitíð, og eisini er ein ávís royndartíð neyðug bæði fyri manning og reiðskap. Eisini er at siga, at trolarin í seinastuni hevur avreitt svartkjaft til p/f Bakkafrost í royndum at framleiða hesa fiskavøru til matna. Tílíkar royndir eru eftir landsstýrisins meting av størsta týdningi í metingini av á hvønn hátt útbyggingin á landi skal fara fram í matframleiðsluni av svartkjafti.

Tað verður tí ikki hildið beint, at trolarin nú fer aftur av landinum. Sum er, er einasti møguleikin at forða hesum, at landskassin veðheldur fyri 1. og 2. prioritetunum.

1. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið varð beint í fíggjarnevndina sum 25. januar 1982 legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. december 1981 og undir fyrstu viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna at veðhalda fyri 1. og 2. prioritetslánum í m/tr. »Gullfinni«.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður upplýst, at eftir roknskapinum hevur skipið fyrsta hálvár 1981 havt 2,3 mió. kr. í rakstrarhalli og 3. fjórðingsár 1,3 mió. kr. eisini í rakstrarhalli, t.v.s. eitt samlað rakstrarhall pr. 30. september 1981 upp á 3,6 mió. kr., áðrenn avskrivingar.

Í rentu og avdrátti uppá 1. og 2. prioritetirnar eru av juli termin falnar 2,3 mió. kr. og nú í januar 1982 falla av somu prioritetum 2,2 mió. kr.

Felagið p/f Vestur, Vestmanna, ið eigur »Gullfinn« kann ikki rinda nevndu skuld og heldur ikki termin av øðrum lánum.

1. og 2. prioritetshavararnir halda fram við tvingsilsinnheintingini, um ikki veðhald verður útvegað.

Undir viðgerðini av málinum í fíggjarnevndini er endaligur ársroknskapur 1981 útvegaður og er hallið fyri 1981 kr. 4.013.705,67.

Skyldugar rentur og avdráttir pr. árslok 1981 fyri 1. og 2. prioritetshavararnar eru kr. 4.888.000,00. Sum nevnt falla kr. 2,2 mió. avdráttir fyri somu nú í januar 1982.

Landsstýrið hevur í viðmerkingum sínum tá støðu, at skipið ikki enn hevur fingið roynt, hvørjar møguleikar tað hevur í tí veiðu tað er ætlað til. Landsstýrið peikar serliga á, at skipið nýliga hevur avreitt svartkjaft til p/f Bakkafrost til matna, og landsstýrið undirstrikar henda tátt serliga sum eina møguliga framtíðarloysn. Tí vil landsstýrið ikki lata skipið av landinum nú.

Fíggjarnevndin hevur, umframt at fíggjarviðurskiftini hava verið gjølliga lýst í nevndini, havt fundir við Regin á Rógvu, skipara og við landsstýrið.

Á fundi í fíggjarnevndini tann 14. januar 1982 greiddi Regin á Rógvu frá viðurskiftunum og nevndi, at so óviss sum viðurskiftini eru innan fiskivinnuna, so ber ikki til at gera rakstrarætlanir. Veiða av svartkjafti til matna er av stórum týdningi sæð í tilknýti til bæði til hvat kann fáa bátin at bera seg einaferð og til hvat kann útbyggjast á landi, bæði viðvíkjandi verandi virkjum, ið gera íløgur í svartkjaftafarslinjum og til møguliga komandi virkir, ið serliga viðgera hesar úrdráttir. Ein møgulig framtíð hjá »Gullfinni« á føroyskum hondum kann bert, sum støðan er í dag, verða grundað á veiðu av svartkjafti til matna og á lodnuna.

Tann 22. januar 1982 vóru Pauli Ellefsen, løgmaður og Olaf Olsen, landsstýrismaður á fundi við fíggjarnevndina um málið eftir áheitan frá nevndini.

Landsstýrisumboðini greiddu frá, at orsøkin til støðutakan landsstýrisins í hesum máli er, at tað verður mett skeivt at lata skipið fara av landinum, hetta hóast landsstýrið ikki sjálvt hevur nakra nágreiniliga rakstrarætlan ella kalkulatión, tí landsstýrið metir, at myndin um svartkjaftin avteknar seg týðuligari nú enn áður.

Í løtuni er orkan at taka ímóti svartkjafti á landi lítil, men áhugi er á fleiri plássum fyri at byggja virkir. Ein loysn er at útbygt verður í nánd av Bakkafrost. Har kann »Gullfinnur« avreiða eina møguliga maximala veiðu, og ein skynsom útbygging av sølumarknaðinum má setast í verk. Hetta kann koma at bera í framtíðini og tí vil landsstýrið ikki lata bátin fara. Um iðnaðarfiskiskapin kann landsstýrið við sínum

fiskiloyvum gera sitt til at stuðla. Landsstýrið kann bert arbeiða heilt konkret við hesum viðurskiftum, umstøðurnar eru ikki til fastar planir ella ætlanir. Tað er ivaleyst eftir landsstýrisins meting, at »Gullfinnur« er effektivur. Svartkjaftaveiðan til matna hevur gingið væl. Tað má ásannast, at eingin vissa er fyri, at skipið ber seg í 1982, men tað er av samfelagsligum týdningi, at henda loysnin verður gjørd.

Ein meiriluti (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Adolf V. Hansen, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg og Øssur Dam Jacobsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at tað framgongur av lógarorðingini, at heimild er fyri at rinda falna skuld, áðrenn lógaruppskotið verður samtykt og at veðhaldsheimildin verður givin landsstýrinum og figgjarnevndini í felag.

Í nevnda meiriluta tilskilar Ivan Johannesen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Adolf Hansen, at støðutakan teirra serliga er grundað á tað framtíðarútlit, at fiskivinnan og fiskiídnaðurin ganga saman um eitt tiltak, sum er so mikið kent av eini roynd, at tað kann eydnast, og eydnast tað ikki, so hevur landskassin lagt tað til, ið kann metast forsvarligt, sjálvt um tølini kunnu blíva stór.

Harumframt framførir Adolf V. Hansen, at vit her hava eitt gott dømi um hvussu hart tiltrongdur tann konverteringsgrunnurin, ið hann í heyst heitti á landsstýrið og serliga Paula Ellefsen og Olaf Olsen, er.

Sami meiriluti setir sostatt fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT
til

uppskot landsstýrisins:

§ 1 verður orðað soleiðis:

»Landsstýrinum verður heimilað saman við figgjarnevndini landskassans vegna at veðhalda fyri 1. og 2. prioritetslánum í m/tr. »Gullfinnur« og at rinda tað, ið neyðugt verður at rinda, av falnum gjøldum til henda dag«.

§ 1 formuleres som følger:

»Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for 1. og 2. prioritetslånene i m/tr. »Gullfinnur« og at betale forfaldne afdrag pr. dato i det omfang, det bliver nødvendigt.«

Minnilutin (Atli P. Dam) førir fram:

Tá veðhaldsheimildin fyri keypi av serligum førum til nýskapan av veiðu- ella viðgerðarhættum ella til útvegan av veiðuorku til givnar fiskimøguleikar, ið ikki verða nýttir, varð samtykt, vóru tingmenn greiðir yvir, at hesir ónýttu møguleikar fyrst og fremst vóru innan svartkjaftastovnin, og teir væntaðu helst, at ávísur almennur stuðul til royndir gjørdist neyðugur enn eina tíð.

Tær royndir at veiða og viðgera svartkjaft, ið undanfarna landsstýrið fór undir miðskeiðis í 70-unum eru enn ikki loknar, og hóast væl er komið áleiðis, er ikki væntandi, at vinnan einsamøll fullførir hesar royndir eftir stuttari tíð. Tí er minnilutin samdur við landsstýrið í ti, at vert er at varðveita í landinum skip, sum hava veiðuevni at royna í svartkjafti meginpartin av árinum. Men minnilutin kennir seg ikki sannførdan um, at uppskot landsstýrisins er rætta loysnin til at skáka sær undan vandanum fyri, at útlendskir lángevarar fara við slíkum skipum av landinum.

Undir viðgerðini av løgtingsmálunum nr. 59 og nr. 60/1981 — har samgongan valdi eina stuttskygda víðkan av kreppulánsheimildini við 15. milj. kr. uttan at góðtaka uppskot javnaðarfloksins um skilabótalán upp á 70 milj. kr. til endurfigging av útlendskum lánum — varð ferð eftir ferð víst á, at vit á henda hátt komu at lóggeva um einstaklingar og einstøk feløg, istaðin fyri at fremja generellar lóggávur, sum seta borgararnar líka fyri lógini. Landsstýrisins uppskot í fyriliggjandi máli er so enn eitt stig á somu leið. Samstundis sleppur slík loysn landsstýrinum at skjóta út tær generellu ábøtur, ið løgmaður boðaði frá skuldu avloysa kreppulánslógina, sum var galdandi nakrar dagar í december 1981.

At vit framvegis 25. januar 1982 ikki hava fingið nakað uppskot til viðgerðar við verunligum ábótum á figgingarmynstrið er tí - - eins og fyriliggjandi uppskot — enn eitt prógv um samgongunnar ráðu- og atgerðarloysi í vinnulívsmálum.

Javnaðarflokkurin hevur leingi vist á, at økt virksemi í útbyggingini innan veiðu og viðgerð av svartkjafti er neyðugt, og at vit tí áttu at givið monnum innflutningsella byggiloyvi til eitt minni tal av svartkjaftaskipum, so samanberingargrundarlagið gjørdist tryggari, og alternativir viðgerðarhættir kundu verið royndir.

Hesum hevur landsstýrið avvíst.

Skal nú skipið, ið hevur frægastu veiðuevnini — men ikki viðgerðarmøguleikarnar ella møguleikar fyri at sleppa av við fongin til matna — fara av landinum, er vandi fyri, at útbyggingin fær slíkt afturstig, at vit ikki vinna hetta aftur eftir tveimum árum.

Landsstýrið hevur sagt frá, at aðrar loysnir enn fyriliggjandi verða ikki mettar nýtiligar, og er tí lítil møguleiki fyri meiriluta fyri øðrum loysnum. Tá so samgongan heldur ikki er før fyri at fremja fyriliggjandi uppskot einsamøll — so sum framgekk av 1. viðgerð málsins -- noyðist minnilutin at atkvøða fyri uppskoti landsstýrisins sum einasta politiska møguleika at fyribyrgja, at m/tr. »Gullfinnur« fer av landinum.

Undir nevndarviðgerðini hevur minnilutin gjørt landsstýrinum vart við aðrar møguleikar:

1. Leigumál fyri skipið til svartkjaftaroyndir, soleiðis skipað, at raksturin kemur at bera seg.
2. Slíkan fyribilsstudning ti konsumegnaðan svartkjaft, at tann tørvandi móttøkumøguleiki á landi ikki gerst orsøkin til rakstrarhall skipsins.

3. Endurfígging við øðrum og lagaligari lánum, herundir lánum til ábøtur og broytingar umborð.
4. Landsstýrið yvirtekur bátin og rekur hann í royndartíðini út frá Vestmanna, meðan útbygt verður á landi og meðan kannað verður, hvørjar møgulcikar umbyggingar ella umleggingar umborð kunnu bøta um rakstrarvánirnar. Setir felagið seg síðani ført fyri at yvirtaka bátin aftur, kann skipan fáast í lag hesum viðvíkjandi.

Av hesum er 3. sjálvsagt frægasta loysnin, men hvørki hana ella 1., 2. og 4. metir landsstýrið hóskiligari enn hana, at landskassin kemur at veðhalda fyri 29 milj. kr., soleiðis at um rakstrarúrtøkan ikki økist munandi beinanvegin, so hevur landsstýrið bert møguleika 4. eftir, tá tapsvandi landskassans skal avmarkast.

Vit vita, at móttøkuorkan á landi økist ikki so skjótt, og mugu tí vænta veðhaldstap í enn eitt longri tíðarskeið.

Figgjarnevndini er greitt, at uppskot landsstýrisins eisini ber í sær heimild til beinanvegin at leggja út falnar rentur og avdráttir (4,5 milj. kr.), og eigur hetta tí at verða greitt tilskilað í tilmæli nevndarinnar.

Undir viðgerðini er eingin roynd gjørd frá landsstýrisins síðu at seta upp ella útvega rakstrarætlan ella metingar um framtíðarútlitið. Hóast slíkar ofta standa á sera veikum botni, hevði ein roynd kanska kortini givið betri hóming av tí forsvarliga í at halda slíkt skip í svartkjaftaveiðu stóran part av árinum við landskassaveðhaldi.

Tað, sum tí stendur eftir, er ein hóming av, at skipið:

1. Tá pris- og marknaðarviðurskiftini eru batnað,
2. Tá landast kunnu 3-400 tons av matfiski um vikuna,
3. Tá tekniskar broytingar og nýskapanir í veiðuamboðum eru royndar og liðugt gjørdar og
4. Tá ein heildarætlan fyri svartkjaftaútbyggingina fyriliggur,

hevur møguleika fyri at fáa slíka javnvág í raksturin, at íløgurnar kunnu fara at løna seg.

Men hetta avdúkar samstundis fylgjandi veruleikar:

1. Verandi orkan á landi uppiheldur ikki einum skipi, ið landar størri nøgdir av konsumfiski,
2. Útbygd orka á landi til størri nøgdir av konsumfiski kann ikki føðast av einum skipi,

Tí er bráðneyðugt við samskipaðari útbygging á landi og sjógvi, soleiðis at talið av skipum samsvarar einum forsvarligum móttøku kapasiteti.

Minnilutin tekur, tá annar møguleiki ikki tykist fyriliggja, undir við uppskoti landsstýrisins, men átalar samstundis seinføri landsstýrisins í støðutakan til heildarspurningin um útbygging av roynd og viðgerð innan svartkjaftavinnu og setir fram soljóðandi:

UPPSKOT
til
samtyktar

1. Landsstýrinum verður álagt beinanvegin at taka upp til endurskoðanar bann sítt fyri útbygging av veiðuorkuni í svartkjaftaveiðu.
2. Landsstýrið leggur skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. apríl 1982 fyri tingið ætlanir um útbygging av orkuni til viðgerð av svartkjafti til matna og av veiðuorkuni, ið krevst til útvegan av samsvarandi rávørunøgd.
3. Landsstýrinum verður álagt beinan vegin at leggja fyri tingið uppskot viðvíkjandi skilabótum til fiskiflotan í staðin fyri lógina, ið fór úr gildi 31. december 1981. (Løgtingsmál nr. 59.)

Minnilutin (Ove Mikkelsen) førir fram.

Hetta mál er eitt stórmál av ymiskum týdningi, og sum hevur verið nógv umrøtt millum manna, og tí biði eg um fyrigeving fyri, at álit mítt er vorðið nakað drúgvt.

Málið hevur verið til viðgerðar í figgjarnevndini, og hevur har fingið so gjølla viðgerð, sum nakað mál áður.

Áskoðanirnar til støðutakan meirilutans í figgjarnevnd og á løgtingi til at geva landsstýrinum heimild til at veðhalda fyri keypi av stórtrolaranum ex. »Siljo« nú »Gullfinnur«, vóru sjálvandi ymiskar.

Høvuðsgrundarlagið var væl tað, at við hesum báti kundu føroyingar tryggja sær møguleika at veiða okkara tillutaðu kvotu av lodnu í norskum sjógvi. Hetta sjónarmið vóru aðrir ímóti — og tað við rætti — vísandi til at henda kvotan var hál at halda um.

Av ymiskum orsøkum gav so hetta skip eitt samlað hall uppá umleið 6,5 mió. kr. Orsøkir, sum hvørki reiðari ella manning var orsøk til, m.a. tí at landsstýrið gav umleið 500 tons av lodnukvotuni aftur til norðmenn, at roynd varð gjørd við Eystur-grønland eftir lodnu, men náddi skipið ongantíð fram á fiskileið vegna stóris, og at makrelveiðan í fjør varð av ongum o.s.fr. Sostatt stendur skipið føroyingum í dag samanlagt í umleið 38,9 mió. kr. Eitt tal, sum tó ikki eigur at ræða nakran, tá vit vita, at menn í dag hava í umbúna at byggja liknandi skip fyri umleið 80-90 mió. kr.

Verður báturin seldur nú, missa landskassin og privat menn hvørt einasta oyra, og norðmenn útvega sær ein bíligan bát, sum vit hava bløtt fyri at fáa niður á nakrar og tjúgu mió. kr. Sum kunnugt er ætlan landsstýrisins at veðhalda fyri tey bæði norsku lánini 1. og 2. prioritet, og fáa eina skipan við 3. prioritet, Stærkodder í Noregi. Viðvíkjandi 4., 5. og 7. prioriteti (7. = 1,5 mió. kr. kreppulán), so eru øll hesi lán við landskassaveðhaldi.

Annars er bátinum játtað eitt serlán uppá umleið 1 mió. kr., sum eigararnir ikki hava nýtt — effektiviserað — vegna vánaligu fíggjarstøðu skipsins. Verður báturin seldur á tvingsilssølu, missa landsstýrið og aðrir hvørt oyra. Tí er spurningurin í dag

tann, um vit skulu lata bátin av landinum aftur til Noregs og gjalda nakrar og tjúgu milliónur krónur til norðmenn fyri nýtsluna?

Tá eg meti hetta at vera skeiva hugsan, er støða mín tann, at vit eiga at varðveita hetta far — helst með alla — ella í hvussu er eini 2-3 ár framyvir, hóast tað útlit, at vit mugu siggja í eyguni, at báturin í hvussu so er kemur at geva hall í verandi árt.

Orsøkin til mína avgjørdu støðu til at varðveita bátin í landinum er m.a. tær nágreiniligu frágreiðingar, sum Regin á Rógvu gav figgjarnevndini, og fylgjandi:

Meira og meira útihýstir av fjar- og millumleiðunum, og við einum toska- og hýsustovni, sum er ovfiskaður, eiga vit einans eitt alternativ — eitt stórt og gott alternativ — um rætt verður farið fram, nevniliga svartkjafturin, sum vit í dag so glaðbeintir geav burtur til høgru og vinstru.

Í viðgerðini av svartkjafti til matna, eru vit longu nú í okkara royndum komnir so langt, at vit m.a. eru førir fyri at framleiða svartkjafta-fars til munandi hægri søluprís og nettoúrtøku enn toskafars, og tað við viðgerð á landi við tryggjaðum 15% feskvirði mótvegis 30% feskvirði av toski.

Vit vita, at tað lønandi her til at góðska svartkjaft á landi, hvat m.a. »Gullfinnur« so týðiliga hevur prógvað, og har við skapað eina nýggja stóra vinnu uppi á landi.

Vit hava gjørt nógvar royndir viðvíkjandi veiðuhátti eftir svartkjafti — nøkrar royndir — men enn ikki funnið heilt fram til veiðuhátt og veiðufør.

Aftur her hevur »Gullfinnur« vist í veru, at hann kann veiða í øllum veðri, hvar aðrir noyðast at liggja bakk, og hevur hann veitt í tonsum frá helmingi til fleirfaldað so nógv pr. troltíma, sum aðrir bátar higartil hava gjørt undir somu umstøðum og á somu fiskileið, uttan iva tí hann kann halda eina betur tógferð: frá 4 til 6 knob.

Yvir fyri figgjarnevndini upplýsti Regin á Róguv, at einans til iðnaðarveiðu til kvotuótryggleikanum, kemur báturin ikki at bera seg, meðan hann ikki ivast í, at um báturin slapp at veiða svartkjaft til matna burturav, so stóð hann seg. Metti, at um teir sluppu av við umleið 400 tons av svartkjafti til matna, so vildi hetta geva teimum eina sølu uppá 16 mió. kr., nokk til at svara hvørjum sítt, enntá við núverandi harðari og dýrari fígging.

Í ringastu tíð hevur báturin veitt umleið 400 tons um vikuna. (Í stuttum dagsljósi verður neyvan tíð til eitt hægst tvey tóg, tí svartkjafturin stendur so spjaddur frá skýming til lýsing).

Men tíverri er í dag tørvur á viðgerðarplássum á landi. Vóru bert 3 virkir av støddsum Bakkafrost aftrat, so hevði borið til hjá »Gullfinni« at fiska til matna burturav.

Flakavirkini í Føroyum hava umleið 40% yvirskotskapasitet um veturin í hvussu er, og ein farslinja til svartkjaft kostar umleið 500.000 kr. og kann viðgera 10 tons við 25% netto úrtøku. Ein slík farslinja rúgvar ógvuliga lítið, og kann setast upp á einum og hvørjum flakavirki við nærum ongari útbygging. T.v.s. at ein íløga í verandi flakavirki til 2-3 mió. kr., so er byrjanin gjørd til viðgerð og góðskan av svartkjafti uppi á landi. Harumframt vita vit at 2-3 svartkjaftavirkir burturav eru í umbúnað.

Viðari varð upplýst, at felag hevur uppfunnið iblandingarvætu, so hesin fiskur kann varðveitast feskur dupult so leingi sum bara við køling.

Eisini greiddi Regin á Rógvu frá, at svartkjaftur kann veiðast á okkara landleið í 9 mánaðir og er hann sera feitur og stórur — upp til 45 cm. — meðan hann í EEC sjógvi er nærum bara skræða og bein.

Til matna hava teir veitt í kølitangar, og hava funnið fram til pumping, sum ikki oyðileggur skræður og kroystir meira enn 2-3% av fiskinum.

Hann metti eisini, at um bert 3 virkir við sama kapasiteti sum Bakkafrost vóru til, so hevði besti háttur verið at pumpa beinleiðis í kølikontainarar, landað kontainararnar bert á einum plássi, og trailer-flutt teir til hini virkini. Hetta hevði givið minni handfaring, betur køli- og feskvarðveitingar umstøður og fleiri tóglimar til skipið ella til skipini.

Niðurstøðan er so tann:

1. At »Gullfinnur« vísir seg at fiska munandi størri nøgdir av svartkjafti pr. troltíma enn aðrir bátar.
2. At hesin dýri báturin kann hvíla í sær sjálvum, um hann hevur umstøður til bert at landa til matna.
3. At við einari fløgu uppá 2-3 mió. kr. kunnu øll verandi flakavirkir taka ímóti minst 100 tonsum av ráfiski av svartkjafti til viðgerðar.
4. At svartkjaftaframleiðsla og søla av góðskaðum vørum er lønandi vinna.

Av hesum nevndu orsøkum fari eg at heita á allar tinglimir um at taka undir við uppskoti landsstýrisins um at varðveita »Gullfinn« í landinum, og lata somu eigararnar reka hann viðari, soleiðis at henda lovandi byrjunarroynd at veiða svartkjaft til matna við góðsking á landi, má halda áfram.

At henda av landsstýrinum uppskotna figging er tann vánaligasta, sum finst, er ein onnur søga.

Betur hevði verið, um eitt størri landslán varð tikið til rímiliga endurfigging av ikki bert »Gullfinni«, men øllum skipunum, sum dragast við hættislig hørð figgingarkor og óvanliga høgum rentum av sera stuttfreistaðum lánum — 17,5%, serstakliga tey norsku lánini — soleiðis at skipini við lagaligari figging høvdu møguleikar fyri at bera seg, uttan á hvørjum ári at vera noydd til at søkja um kreppuhjálp.

Andstøðan hevur víst á hesa betru og sunnaru gongdu leið, bæði í nevndum og við løgtingsuppskotum, tó bert til fánýtis.

Men ásannandi máttloysis og tilvildarliga politikkin hjá sitandi samgongu, so kunnu vit ikki vænta betur loysn av kreppustøðuni.

So hóast alt, má eg mæla tinglimum til at atkvøða fyri hesum uppskoti, um ein vil skipinum og svartkjaftaroyndunum væl.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) førir fram:

Longu við keypið av nú »Gullfinni« gjørdi stjálvstýrisflokkurin vart við hesa

óhepnu ætlan og vísti til tørvandi sjálviløgu, eitt væntandi vánaligt rakstrarúrslit orsakað av tørvandi veiðumøguleikum.

Hetta verður nú váttað við fyriliggjandi roknskapi frá P/f Grannskoðara virkinum Paula Ellefsen statsgóðk. grannskoðara. Hesin roknskapur visir, at báturin 1. hálvár 1981 hevur eitt hall stórt 2,4 milj. kr. og er hetta hall ultimo september vaksið til 3,7 mill. kr. uttan avskriving og gjald av rentum.

Hesi gjøld eru pr. 1. januar 1982 7,852 milj. kr.

Umsetningurin hjá bátinum er pr. 30. august 1981 uppgjørdur til 8,792 milj. kr. fyri 9 mánaðir rakstur.

Hetta úrslit verður av Grannskoðaravirkinum mett til 27,7 milj. kr. fyri 12 mánaðir í 1982.

Einki verður tó sagt um hvar og hvat veiðast skal ella almennan stuðul til veiðuna.

Á fundi í fíggjarnevndini boðaðu Pauli Ellefsen, løgmaður og Olaf Olsen, landsstýrismaður frá tilráðing um veðhald fyri at gerast kundi roynd við bátinum at fiska til matna, og tá viðgerðarmøguleikarnir ikki eru tøkir á landi, so at útbyggja ávis virkir til móttøku av svartkjafti til farsframleiðslu.

Seinri partur av ætlanini er hugsan, ið til tíðir hevur verið framborin á tingi, og er til hetta eingin viðmerking meðan skiparoyndin má metast órímiliga kostnaðarmikil fyri skattgjaldaran.

Sum er veðheldur hesin fyri 8,86 + 1,5 = 10,36 milj. kr. í bátinum. Nú er tiltnæli um veðhald fyri 21,89 milj. aftrat, so hin samlaða veðhaldsupphæddin røkkur teimum 32,25 milj. kr.

Til hesa upphæddina skal so roknast fallin renta og avdráttur pr. 1. januar 1982, ið er 7,852 milj. kr.

Tað, skattgjaldarin í fyrstu atløgu kemur at borga fyri, verða sostatt góðar 40 milj. kr., og verður hetta tilrátt uttan krav um innskot av eginpeningi.

Vit meta ikki, at nakað fíggjarligt grundarlag er undir hesum projekti, sum krevur veðhald og beinleiðis gjald av skattgjaldaranum uppá 40 milj. kr., men av tí at landskassin veðheldur fyri góðum 10 mió. kr., sum verða mistar um báturin fer av landinum, og skipið síðstu tíðina hevur roynst væl í svartkjaftaveiðu, sum kann koma at geva nógv arbeiði á landi, verður sett fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at fyrirreika endurfigging og at kanna møguleikarnar at selja m/tr »Gullfinnur« til menn ella virki, sum hava eginpening, so at skipið ikki fer av landinum og at fíggjarligi missur landskassans verður so lítil sum møguligt um skipið verður selt á uppboði.

2. viðgerð 26. januar. Málið varð aftur beint í figgjarnevndina, sum 5. februar legði fram

ÁLIT
II

Figgjarnevndin legði fram álit 25. januar 1982, og var málið til 2. viðgerð í løgtinginum tann 26. januar 1982.

Eftir uppskoti frá Erlendi Patursson var málið beint aftur í figgjarnevndina.

Sami meiriluti leggur fram álitið frá 25. januar fram aftur óbroytt og viðmerkir til fyrispurningarnar frá Erlendi Paturssyni:

1. Tá málið er samtykt í løgtinginum, kann figgjarmálaráðharrin ikki steðga avgreiðslu av málinum.
2. Peningurin verður rindaður sum útlagdur peningur vegna veðhaldsskyldu fyri m/tr. »Gullfinn« og bókaður sum skuld á gjaldstovuni.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen) vísir til upprunaálit sjálvstýrisflokksins, samstundis verður enn einaferð gjørt vart við ta figgjarligu ábyrgd, landskassin tekur á seg uttan krav um nýfigging frá eigaranum ella øðrum, sum annaðhvørt saman við núverandi eigarum ella einsamallir yvirtaka skipið. Við hesum í huga er tað óhugsandi, at nakað skip, reiðarí ella virki eftir hetta kemur so fyri figgjarliga, at landskassin ikki má taka um endan, tá rættindini megu vera samsvarandi fyri hin einstaka og virkir her á landi. Hóast tað, almennum íløgum og ábyrgd, sum meirilutin mælir til, er báturin *ikki* landskassans ogn, og ger hetta, at hann hevur fritt at fara til ta veiðu, ið lønsamast er, eins væl og søla kann fara fram. Eisini er minnilutin av teirri áskoðan, at skipið av landsstýrinum kann verða bundið at svartkjaftaveiði til matna.

Framhaldandi 2. viðgerð 5. februar. Uppskotið frá Erlendi Patursson um at beina málið aftur í nevnd fall við 19 atkvøðum ímóti. Uppskot frá minniluta í nevnd fall við 6-0. Uppskotið frá meirilutanum í nevndini varð samtykt við 22 ja-atkvøðum, 1 atkvøddi nei, 6 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jacob Lindenskov, Ove Mikkelsen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jákup Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein.

Nei atkvøddi: Hilmar Kass.

Atkvøddu ikki: Asbjørn Joensen, Fredrik Olsen, Erlendur Patursson, Ingrid Sondum, Petur Reinert, Hans M. Joensen.

Burtursladdir: Juul Jacobsen, Atli Dam, Finnbogi Isaksen.

§ 2 varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Uppskot til samtyktar frá Javnaðarflokkinum pkt. 1, 2 og 3 fullu við ávikavist 8-0, 12-0 og 7-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. februar. Formaðurin boðaði frá skrivi frá Javnaðarflokkinum við uppskoti um at beina málið aftur í nevnd. Málið varð sostatt beint aftur í fíggjarnevndina.

Framhaldandi 3. viðgerð 9. februar. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 21-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1415-11-220. Lóg nr. 16 frá 15. februar 1982.

---

79. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl v.m. á goymslu.

Ár 1982, týsdagin 19. januar legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ *1.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1982/83 at garantere for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 11 frá 17. mars 1981, sum samanborið við frammanundan galdandi lógir eisini gav heimild at veita veðhald fyri lánum til úrdrátt úr svartkjafti.

Lógin skal bert galda komandi fíggjarár. Vist verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

1. viðgerð 20. januar. Málið varð uttan orðaskifti beint í fíggjarnevndina, sum 25. januar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. januar 1982 og við 1. viðgerð tann 20. januar beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild til landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 5. februar. § 1 varð samtykt við 26-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 12. februar. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1408-5-2. Lóg nr. 28 frá 11. mars 1982

80. Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.

Ár 1982, týsdagin 19. januar legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.

§ *1.* Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 og 1983/84 at veðhalda fyri lánum upp til 2 milj. kr. hvørt fíggjarárið til smærri ídnaðarvirkir.

§ *2.* Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, víðkan og nútímansgerð av gomlum o.t.
2. stk. Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju íløgurnar hava eftir meting, og skulu verða tryggjaðar við panti innanfyri 70% av tí virði, pantsettu lutirnir hava.

§ *3.* Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1982/83 og 1983/84 at garantere for lån indtil 2 mill. kr. hvert finansår til mindre industrivirksomheder.

§ *2.* Disse lån skal anvendes til nyetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af ældre o.l.
Stk. 2. Lånene må ikke overstige 70% af nyinvesteringernes værdi i henhold til vurdering og skal sikres ved pant indenfor 70% af de pantsatte genstandes værdi.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi við løgtingslóg nr. 49 frá 12. mai 1980, tó verður veðhaldsheimildin nú 2 milj. kr. ímóti 1,5 milj. kr. árliga.

Lógin var tá galdandi fyri fíggjarárini 1980/81 og 1981/82.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 51/1979, Løgtingstíðindi 1979, bls. 186.

1. viðgerð 20. januar, útsett. Framhald 22. januar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 4. februar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Síðani tørvur er á millumlanda góðkendum reglum um uppmáling av skipum boðaði IMCO til fundar í London í mai/juni 1969. 55 lond vóru umboðað, og samtykti fundurin 23. juni 1969 nýggjan millumlanda sáttmála um uppmáling av skipum. Sáttmálin fær gildi 24 mánaðir aftaná dagin, tá ið í minsta lagi 25 lond, ið hava ikki minni enn 65% av allari skipstonnagu, eru gingin undir sáttmálan. Hesar treytir fyri gildi sáttmálans eru loknar 18. juli 1982, Danmark er millum londini, ið hava góðkent hann, og fær sáttmálin gildi frá nevnda degi.

Lógaruppskot landsstýrisins er í innihaldinum í samsvar við lóg nr. 203 frá 18. mai 1977 »om skibsmåling«. Broytingarnar eru orsakaðar av, at málsøkið uppmáling av skipum er yvirtikið føroysk sermál. Landsstýrið er tí sett inn í staðin fyri donsku ráðharradeildina, og Statens Skibstilsyn hevur ikki eftir lógini myndugleika til uppmáting, men bert tey fólkini eina tann stovnur, sum landsstýrið gevur henda myndugleika til. Við hesum samsvari millum uppskotið og donsku lógina verður vist til viðmerkingarnar til »lóg om skibsmåling«.

Í § 1 í uppskotinum er myndugleikin, ið hevur uppmálingarnar í hondum, týstur. Myndugleikin hevur verið Statens Skibstilsyn, ætlanin er at halda fram við hesi skipan. Samsýning verður latin fyri at røkja uppgávuna.

Lógaruppskotið førir ikki við sær øktar útreiðslur fyri landskassan.

1. viðgerð 10. februar. Málið varð beint í løganevndina, sum 9. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum 5. februar 1982 og við 1. viðgerð 10. i sama mánaði beint i løganevndina.

Galdandi løgtingslog nr. 38 frá 4. mai 1957 um uppmáling av skipum við seinni broytingum byggir millumlanda sáttmála frá 10. juni 1947 um einsháttaðar reglur um uppmáling av skipum (Oslo-konventiónin). Hesin sáttmálin fekk ikki undirtøku frá fleiri av londunum við største skipatonsatalinum. Tann 23. juni 1969 varð gjørdur ein nýggjur millumlandasáttmáli um skipauppmáling, sum kemur i gildi i ár, nú lond við yvir 65% av allari skipatonnagu hava ratificerað sáttmálan. Fyriliggjandi lógaruppskot samsvarar við hendan nýggja sáttmálan og er galdandi fyri nýggj skip 24 m ella longri. Galdandi lóg verður sostatt bert galdandi fyri eldri skip og skip undir 24 m, tó soleiðis, at tá 12 ár eru liðin, skulu øll skip hava málibræv eftir nýggju lógini.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 12. mars § 1 varð samtykt við 25-0, §§ 2-12 vórðu samtyktar við 26-0.

3. viðgerð 16. mars. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1606-3. Lóg nr. 90 frá 10. juni 1982.

---

83. Fyribilsskipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1982

Ár 1982, friggjadagin 22. januar legði løgmaður vegna landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir, at Sovjetsamveldið fær loyvi við 14 skipum fram til 1. mars

1982 at veiða á konto 10.000 tons aftrat ella 20.000 tons tilsamans av svartkjafti uppá sáttmálan fyri 1982.

Viðmerkingar:

Sambært skipanina millum Føroya og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvd verða pørtunum at fiska í sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1982 vóru í Moskva 24. - 25. september 1981, og samdust partarnir um skipan av fiskiskapinum fyri 1982.

Sáttmálin er ikki lagdur fyri løgtingið, av tí at landsstýrið ikki hevur fingið endaliga úrslitið av samráðingunum millum Noreg og Sovjet viðvíkjandi føroyskum fiskiskapi av ávísari nøgd av toski í norskum sjógvi.

Marknaðarnevndin góðkendi á fundi tann 29. december 1981 at loyva Sovjetsamveldinum á konto við 14 skipum í tíðarskeiðinum 1. januar 1982 - 31. januar 1982 at veiða 10.000 tons av svartkjafti.

Sovjetsamveldið hevur biðið landsstýrið um at fáa loyvi til at halda áfram við fiskiskapinum eftir svartkjafti.

Báðir partar eru áhugaðir fyri at byrja fiskiskap á konto hjá hvørjum øðrum frá 1. januar 1982, og eru eisini føroysk skip á sovjettiskum sjóøki.

Frávik varð givið til at hava 1. viðgerð seinni á sama fundi. Málið fekk 1. viðgerð og varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 25. januar. Uppskotið varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-2.

---

84. Fyrispurningur til ríkisumboðsmannin.

Ár 1982, mánadagin 25. januar boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Adolf V. Hansen soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Føroyar og Grønland eru tvey heimastýrd lond innan danska ríkisfelagsskapin. Tað eru nógvir føroyingar og eyðvitað eisini grønlendingar fastbúgvandi ella ferðandi í Danmark, eins og eitt ótal av føroyingum siglir við donskum og útlendskum handilsskipum. Harumframt eru burtur frá Føroyum, stóran part av árinum, nógvir føroyskir fiskimenn t.d. í Barentshavinum, í Eystursjónum, við Ísland og Eysturgrønland eins og norðanfyri Føroyar, sum ikki hoyra Útvarp Føroya, men tó kunnu hoyra Danmarks Radios P1.

Danmarks Radio hevur verið og er makaleyst móti minnilutum, teir veri seg frá Suðurjútlandi, Grønlandi, Føroyum ella fremmandalondum (fremmedarbejdere). Danmarks Radio sendir í løtuni:

15 minuttir til føroyingar um vikuna
70 minuttir til grønlendingar um vikuna og
220 minuttir um vikuna til ymsar útlendingar
(sokallaðir indvandrere).

Sum tað sæst er munin minst senditíð avsett til føroyingar.

Fyri stuttum varð mál lagt fyri Føroya Løgting um loyvi at uppseta ein 50 kw millumbylgjusendara eins og tað fyriliggur ein umsókn í landsstýrinum um loyvi at uppseta ein 200 kw sendara. Eftir boðum frá ríkismyndugleikunum varð málið tikið av dagsskránni.

Megna vit føroyingar, antin einsamallir ella saman við øðrum at seta á stovn so stóran sendara, kemur føroyska røddin at hoyrast av mongum einum føroyingi, sum av eini hvørji orsøk er noyddur at vera burtur frá oyggjunum í stytri ella longri tíðarbil.

Væl vitandi at vit ikki hava krav uppá senditíð í ella frá Danmarks Radio, men siggjandi munin millum ta senditíð avsett verður grønlendingum og føroyingum ávikavist 70 og 15 minuttir pr. viku, fari eg at loyva mær at spyrja ríkisumboðsmannin fylgjandi:

> Er tað møguligt hjá Danmarks Radio at avseta 10 minuttir um dagin til føroyskar tíðindasendingar á longbylgjusendarnum (P1) frá nú av og til vit hava ein sendara sum nøktar tað sum omanfyri er fært fram.

26. januar varð við 29 0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

5. februar svaraði ríkisumboðsmaðurin Adolf V. Hansen soleiðis:

SVAR

Der er rejst følgende forespørgsel til mig:

Er det muligt for Danmarks Radio at afsætte 10 minutter daglig til færøske nyhedsudsendelser på langbølgesenderen (P.1) fra nu af og indtil vi har en sender, der er i stand til at dække de områder, der er omhandlet ovenfor i forespørgselen d.v.s. færinger, der er bosat eller opholder sig i Danmark, færinger der sejler med danske eller udenlandske handelsskibe og færøske fiskere, der fisker i f.eks. Barentshavet, ved Island og Østgrønland samt nord for Færøerne, hvor den færøske radio ikke for tiden kan høres, men hvor Danmarks Radio P.1 kan høres.

Ved besvarelsen af forespørgselen er jeg gået ud fra, at der tænkes på nyhedsudsendelser på færøsk om færøske forhold.

Jeg skal hertil oplyse, at i henhold til lov om radio- og fjernsynsvirksomhed (lov nr. 421 af 15. juni 1973) § 6 er Danmarks Radio en selvstændig offentlig institution, der ledes af et radioråd.

Dette radioråd er den øverste ledelse og har den endelige administrative afgørelse i sager, der vedrører Danmarks Radio's programvirksomhed. Dog kan klager over radiorådets afgørelse om bestemte programmer eller programserier indbringes for et nævn, radionævnet. Dette nævns afgørelser kan ikke indbringes for anden administrativ myndighed.

Ministeren for kulturelle anliggender nedsætter såvel radiorådet som radionævnet, men kan ikke give direktiver vedrørende programmer. På dette område er radiorådet og radionævnet suveræne.

Det er således ikke muligt for mig på regeringens vegne at kunne svare, om det er muligt for Danmarks Radio at sende 10 min. daglig færøske nyhedsudsendelser over den danske langbølgesender.

Hvis hjemmestyret ønsker dette, er jeg imidlertid villig til gennem statsministeriet at bringe et sådant ønske videre til den rette myndighed, Danmarks Radio.

Jeg skal dog for en ordens skyld henlede opmærksomheden på, at de færøske nyhedsudsendelser ifølge aviserne vil blive genudsendt hver uge således at der fra 1. maj 1982 vil være 30 min. ugentlig.

85. Samráðingar um undirgrundina, og ráevni í henni

Ár 1982, mánadagin 25. januar legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Føroya Løgting sýtir hervið landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkisstýrið um yvirtøku av undirgrundini við tað at Danmark *ikki* sambært heimastýrislógina er ánart av undirgrundini eins og bert lítil partur av núverandi Føroyska territoriinum metist hoyra undir heimastýrislógina.

Líkaleiðis sýtir tingið landsstýrinum at samráðast um ráevni í undirgrundini, við tað at danir við sínum passiviteti hava mist allan samráðingarrætt á hesum øki.

Viðmerkingar:

»Føroyar eru sjálvstýrandi fjóð í danska ríkinum samsvarandi hesi lóg.« Soleiðis fjóðar § 1 1. stk. í heimastýrislógini.

»Føroyar« sambært heimastýrislógina hava í 1948 umfatað oyggjarnar og sjóøkið uttanum tær út á 3 fjórðingar úr næsta kletti. Tað, ið vunnið er afturat uttanfyri 3 fjórðingar, er ikki vunnið til danir, men til føroyingar, eins og vunna økið ikki var partur av Føroynum í 1948, og sostatt ikki umfatað av heimastýrislógini. Tað vil við øðrum orðum siga, at ley fyrivarnir danska ríkisstjórnin tók í 1948 m.a. viðvikjandi »ráevni í undirgrundini« ikki eru galdandi fyri økið millum 3 fjórðingar og 200 fjórðingar/miðlinjuna.

Hvat ið viðvíkir sjálvum oyggjunum og økinum út á 3 fjórðingar t.v.s. økið ið kallaðist Føroyar tá heimastýrislógin kom í gildi, er at siga, at orðið »undirgrund« ikki er definerað og kann tulkast á ymsan hátt.

Men uttan mun til um vit geva orðinum »undirgrund« hin fasta ella stabila latínska týdningin substratum, ella vit geva tí tann meira labila enska týdningin subsoil, so hava vit nýtt ráevnir úr undirgrundini í tey 34 árini heimastýrislógin hevur staðið við makt, uttan at samráðingar hava verið við danir og *uttan* at danir hava gjørt vart við teirra samráðingarrætt sambært § 3 í heimastýrislógini.

34 árs nýtsla uttan tilsøgn av nøkrum slag frá dønum gevur føroyingum hevdsrætt yvir »ráevni í undirgrundini«. Sjálva undirgrundina hava føroyingar altíð átt og hava danir ikki tikið nakað fyrivarni í heimastýrislógini henni viðvikjandi.

At fara at samráðast við danir um »ráevni í undirgrundini« er tað sama sum at viðurkenna dønum yvirvaldsrættin yvir Føroyum, mótvegis at fasthalda at Føroyar eru sjálvstýrandi tjóð í danska ríkinum....

1. viðgerð 9. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 25. januar 1982 og undir 1. viðgerð tann 9. februar 1982 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 20. apríl 1982 viðgjørt málið og vísandi til skriv frá skrivstovustjóra Jóhan Djurhuus dagfest 30. mars 1982 viðvíkjandi sama máli, setir ein samd nevnd einki uppskot fram.

Tórshavn 30. mars 1982.
Jd/BKP

1. Marknaðarnevndin hevur á fundi 10. mars 1982 í samband við uppskot til samtyktar frá Adolf Hansen, løgtingsmanni í løgtingsmáli nr. 85/1981: Samráðingar um undirgrundina og ráevni í hesum samtyki at seta undirritaða fylgjandi spurning:

»Er nakað hald í viðmerkingunum hjá Adolfi Hansen, sæð í relatión til okkara viðurskifti við danskar myndugleikar.«

2. Eftir uppskotinum skal løgtingið samtykkja at sýta landsstýrinum at samráðast við ríkisstýrið um yvirtøku av undirgrundini við tí motivering, at Danmark eftir heimastýrislógini ikki er eigari av undirgrundini og bert lítil partur av núverandi føroyska territoriinum er undir heimastýrislógini. Ein onnur motivering fyri ikki at samráðast er, at danir við sínum passiviteti hava mist samráðingarrættin.

Í viðmerkingunum verður ført fram, at tað sum vunnið er uttanfyri 3 fjórðingar, síðani heimastýrislógin kom í gildi í 1948, er vunnið til Føroyingar og ikki danir, og at tey fyrivarni ríkisstýrið tók í 1948 viðv. ráevni í undirgrundini ikki eru galdandi fyri økið uttanfyri 3 fjórðingar. Eisini verður ført fram, at vit hava nýtt ráevni í undirgrundini síðani heimastýrislógina, t.v.s. í 34 ár, uttan at danir hava gjørt vart við seg, føroyingar hava tí vunnið hevdsrætt til undirgrundina. At samráðast um undirgrundina er sostatt at viðurkenna, at danir hava yvirvaldsrættin yvir Føroyum.

3. Tá ið heimastýrislógin kom í gildi vóru territorialmarkið og fiskimarkið samanfallandi 3 fjórðingar frá nærmasta landi. Síðani tá er fiskimarkið so líðandi flutt út, til tað frá 1. januar 1977 er 200 fjórðingar frá beinum grundlinjum. Territorialmarkið er framvegis 3 fjórðingar tó nú frá beinum grundlinjum, seinasta fyriskipan er kgl. fyriskipan nr. 599 frá 21. december 1976 »om afgrænsning af søterritoriet ved Færøerne«.

Úflytingin av fiskimarkinum er gjørd við kgl. fyriskipan nr. 598 frá 21. december 1976 »om fiskeriterritoriet ved Færøerne« við heimild í § 1,3. stk. í lóg nr. 597 frá 17. december 1976 »om Danmarks Riges fiskeriterritorium«.

Løgtingslóg nr. 76 frá 27. december 1976 og nú løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiðu á landleiðini tekur upp aftur, hvør landleiðin er og seta reglur fyri, hvør hevur loyvi til fiskiskap og eftir hvørjum reglum.

Lóggávuvaldið í spurninginum um fiskimarkið er eftir hesum, tá talan er um at áseta sjálvt markið, hjá ríkisstýrinum, meðan áseting av reglum um fiskiskapin er hjá heimastýrinum við yvirtøku av málsøkinum á lista A í heimastýrislóginni: Fiskiskapur og friðan av fiski á territoriinum. »Territoriið« er í hesum sambandi at skilja sum fiskariterritoriið.

Viðv. undirgrundini er galdandi lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 »om efterforskning og indvinding af råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund«. Lógin umfatar bert landjørðina og tap sum undir henni er. Í Føroyum er lógin galdandi við teimum av markingum sum fylgja við heimastýrislógini, jbr. § 11, t.e. at málsøkið kann yvirlakast. Eftir lógini eigur danski staturin øll ráevni í undirgrundini, sum ikki frammanundan 23. februar 1932 eru vunnin privatøkonomisk. Av evnum vunnin privatøkonomisk áðrenn nevnda dato kunnu nevnast kol, sandur, grót, leirur og royða. At vinna onnur evni krevst loyvi frá ríkisstýrinum.

Tá ið landgrunnsmum umræður er galdandi kgl. fyriskipan nr. 259 frá 7. juni 1963 »vedrørende udøvelsen af dansk højhedsret over den kontinentale sokkel«. Heimild fyriskipaninar er Geneve-konventiónin frá 29. apríl 1958 um landgrunnin. Í § 1 í fyriskipanini verður sagt »Dansk højhedsret udøves, for så vidt angår udforskning og udnyttelse af naturforekomster over den del af den kontinentale sokkel, der efter den i Geneve ..... undertegnede konvention om den kontinentale sokkel tilhører det danske rige«. At vinna hesi »naturforekomster« krevst loyvi eftir reglunum í undirgrundslógini frá 1950.

4. Eftir tí, sum her er flutt fram, er tað ríkismyndugleikarnir, ið hava flutt fiskimarkið út við heimild í lóg um fiskarioki hjá danska ríkinum, jbr. eisini løgtingstíðindi 1976 bls. 19: Útflyting av fiskimarkinum, har løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at samráðast við ríkisstýrið um at flyta fiskimarkið út. Við útflytingini verður nýtt fiskarioki lagt til ríkið og ikki til ávisan part av ríkinum, t.v.s., at ríkið ella ríkismyndugleikarnir hava yvirvaldsrættin. Hinvegin hevur heimastýrið samtykt yvirtøku við heimild í heimastýrislógini myndugleikan at áseta reglur um sjálvan fiskiskapin á føroysku landleiðini.

Sama, sum sagt er um landleiðina, kann eisini sigast um landgrunnin, at tað er ríkismyndugleikarnir, ið siga frá, at landgrunnurin er lagdur undir »dansk højhedsret«, sum lógin sigur. Eisini her er talan um at leggja til ríkið og ikki til ávisan ríkispart. Munurin millum landleiðina og landgrunnin er, at landgrunnurin ella málsøkið »ráevni í undirgrundini« er ikki yvirtikið sermál, og er tí lóggávuvaldið hjá Fólkatinginum. Endamálið við samráðingunum er, at fáa málsøkið undir heimastýrið við yvirtøku eftir heimastýrislógini.

Um tað, at føroyingar hava vunnið hevdsrætt til ráevni í undirgrundini, ti vit hava vunnið nokur ráevni, síðani heimastýrislógin kom í gildi og ti, at danir ikki hava, kravt samráðingar um málið, er fyrst at siga, at undirgrundslógin sigur, hvørji ráevni, ið hvussu er á landjørðini, staturin ikki hevur ognarrættin til, øll onnur eigur hann. Viðv. samráðingum er støðan, at um ongar samráðingar vera ella einki úrslit spyrst úr samráðingunum, so er málsøkið »ráevni í undirgrundini« framvegist eitt ikki yvirtikið sermál. At gera eina broyting er tað mest náttúrliga, at heimastýrið tekur initiativið, og ikki tann parturin, ið einki ynskir hevur um broyting.

5. Eftir tí sum her er flutt fram, heldur undirritaði tað ikki vera rætt, sum Adolf Hansen, løgtingsmaður førir fram sum grund fyri at sýta landsstýrinum at samráðast við rikisstýrið um yvirtøku av málsøkinum: Ráevni í undirgrundini.

2. viðgerð 23. apríl. Uppskotið fall við 2-0 atkvøðum.

86. Fyrispurningur til løgmann

Ár 1982, mánadagin 25. januar boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Ætlar landsstýrið at halda sítt orð og geva Peturi í Dali og øðrum innflutningsloyvi til ein bát í staðin fyri »Vón«?
2. Nær kann hetta loyvi væntast givið?
3. Um ætlanin er at sýta innflutningsloyvi, hvør grundgeving liggur so aftanfyri slíka noktan?

Viðmerkingar:

Væl áðrenn ólavsøku í fjør gjørdu eigararnir av »Vón« støðuna upp við ti í hyggju at útvega sær eitt betri hóskandi skip, serstakliga til veiðu á djúpari vatni á Føroya leiðini.

Tveir møguleikar vóru, antin at leingja »Vón« og seta ein munandi størri motor í bátin ella at selja hann av landinum, og so keypa betri hóskandi skip uttanlands.

Hetta seinra varð valt, og søktu teir tí landsstýrið um útflutningsloyvi til »Vón« móti keypi av øðrum skipi.

Landsstýrið játtaði skrivligt útflutningsloyvi og gav munnliga tilsøgn um innflutningsloyvi. Báturin varð so seldur áðrenn ólavsøku, og høvdu eigararnir tá funnið fram til hóskandi far til sámuligan prís og figgjan.

Men hvat hendir, tá teir so biðja um innflutningsloyvi? Jú, tá sigur landsstýrið, at tað er totalt bann móti innflutningi av skipum.

Við øðrum orðum, so eggjar landsstýrið hesum dugnaligu monnum at selja bátin, og so uttan at blunka gongur frá teirra tilsøgn um innflutningsloyvi til annan bát.

Kann landsstýrið bjóða monnum slíka viðferð? Er slíkt ikki tap, ein kallar fyri »lupp og bluff«? Hvussu kann nakar so hava nakað álit á sitandi landsstýrið. Her var jú bert talan um at skifta yvir til betri bát.

At løgmaður so — sjálvur annar — selir teimum »Nónhamar«, eftir mínum tykki ikki sørt av óregluligari framferð, broytir ikki støðuna. Tí fari eg at loyva mær at seta løgmanni hesar spurningar.

26. januar varð við 29-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

12. februar svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 86/1981, dagfest 25. januar 1982, hevur Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, sett mær hesar spurningar:

1. Ætlar landsstýrið at halda sítt orð og geva Peturi í Dali o.ø. innflutningsloyvi til ein bát í staðin fyri »Vón«?
2. Nær kann hetta loyvið væntast givið?
3. Um ætlanin er at sýta innflutningsloyvi, hvør grundgeving liggur so aftan fyri slíka noktan?

Viðv. 1. spurningi;

Tann 24. juni 1981, t.v.s. næstan hálvt ár aftan á at sitandi landsstýri tók við, bað p/f Norðstjørnan um innflutningsloyvi til trolaran »Sancy« úr Frakklandi. Áðrenn sitandi landsstýri tók við, søkti p/f Norðstjørnan um innflutningsloyvi til trolara úr Bretlandi. Skrivliga tilfarið í landsstýrinum vísir ikki, at nakað innflutningsloyvi er givið av undanfarna landsstýri.

Í svari upp á áðurnevndu umsókn, dagfest 24. juni 1981, sigur landsstýrið frá, at landsstýrið hevur samtykt, at áðrenn støða verður tikin til fyriliggjandi mál, verður eina tíð at fylgja við gongdini av teimum skipum, ið eru. Lagt varð alfrat, at teir um-

søkjarar, ið kunnu vísa á, at teir hava flutt skip út av landinum, hava cin fyrimun, tá landsstýrið einaferð tekur støðu til møgulig innflutningsloyvir.

Við øðrum orðum hevur p/r Norðstjørnan fingið at vita, at tá landsstýrið aftur fer at loyva innflutning av skipum, so skuldi ligið væl fyri hjá hesum monnum at fingið eitt innflutningsloyvi.

Viðv. 2. spurningi:

Landsstýrið hevur heitt á fiskivinnuráðið um, saman við øðrum, at lýsa verandi fiskimøguleikar og ta veiðuorku, sum føroyingar eiga í dag.

Sum nú er, verða 200-250 milj. kr. úr landskassanum endurgoldnar føroysku fiskivinnuni.

Ein høvuðsorsøkin er ivaleyst, at verandi veiðufloti ikki hevur nóg rúmar veiðumøguleikar.

At loyvt innflutningi av skipum, sum ikki økja um samlaðu veiðuna, uttan at skaða fiskastovnarnar, vildi verið skeivt. Hetta vildi ført við sær tørv eftir enn størri endurgjaldi úr landskassanum uttan tilsvarandi meir-framleiðslu.

Tá nevnda tilfar frá fiskivinnuráðnum um lýsing av veiðumøguleikum og veiðuorku fyriliggur, fer landsstýrið at taka spurningin upp til viðgerðar.

Viðv. 3. spurningi:

Vísandi til tað, sum er nevnt undir 1. og 2. spurningi, verður grundgeving fyri møguligari sýtan av innflutningsloyvi, at tey ávísu skipini ikki høta um føroyska búskapin sum heild.

---

87. Undirgrund og havbotnur

Ár 1982, mánadagin 25. januar legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Av tí at tað má haldast vera landsskaðiligt, soleiðis sum løgmaður hevur upplýst, at 8 ósamdir menn skulu til Danmarkar at samráðast við donsku rikisstjórnina um yvirtøku av undirgrund og havbotni, samtykkir løgtingið at áleggja landsstýrinum at

ûlnevna menn í hesa samráðingarnevnd, ið vilja fremja løgtingssamtyktina frá 1975 um hesar yvirtøkur.

9. februar boðaði formaðurin frá, at málið var aftantikið og kemur ikki aftur til viðgerðar.

---

88. Nýggj jarðamóðurskipan

Ár 1982, mikudagin 3. februar legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

I

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir fylgjandi uppskot í hjálagda nevndaráliti:

1) Uppskot til kgl. fyriskipan um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 627 frá 13. december 1978 »om jordemødre«.

Løgtingið samtykkir fylgjandi uppskot í hjálagda nevndaráliti:

1) Uppskot til kgl. fyriskipan um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 627 frá 13. december 1978 »om jordemødre«.
2) Uppskot til kgl. fyriskipan um at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 282 frá 7. juni 1972 »om svangerskabshygiejne og fødselshjælp«.

II

Uppskot
til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra.	*lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om fordeling af Færøernes andel af jordemødrenes løn.*
§ *1.* Løgtingslóg nr. 25 frá 7. september 1954 um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra fer úr gildi.	§ *1.* Lagtingslov nr. 25. af 7. september 1954 om fordeling af Færøernes andel af jordemødrenes løn ophæves.

§ 2. Landsstýri fyrisetir í kunngerð, nær lógin kemur í gildi.

§ 2. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse, hvornår loven træder i kraft.

III

Uppskot
til

løgtingslóg um avtøku av løgtingslóg um endurgjald til barnakonur fyri ferðaútreiðslur til kanning hjá lækna ella jarðamóður.

lagtingslov om ophævelse af lagtingslov om refusion af gravide kvinders rejseudgifter til undersøgelse hos læge eller jordemødre.

§ *1.* Løgtingslóg nr. 32 frá 27. mai 1968 um endurgjald til barnakonur fyri ferðaútreiðslur til kanning hjá lækna ella jarðamóður fer úr gildi.

§ *1.* Lagtingslov nr. 32 af 27. maj 1968 om refusion af gravide kvinders rejseudgifter til undersøgelse hos læge eller jordemoder ophæves.

§ *2.* Landsstýrið fyrisetir í kunngerð, nær lógin kemur í gildi.

§ *2.* Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse, hvornår loven træder i kraft.

Viðmerkingar;

ad 1. Verandi skipan fyri fylkisljósmøður er yvir hundrað ár, og stavar frá ti tíðini, tá barnakonur áttu heima. Í dag eiga allar barnakonur á sjúkrahúsum, og við ti fyri eyga var í álitinum, viðvíkjandi kommunulæknaskipanini, skotið upp at broyta skipanina. Við hesum áliti sum grundarlagi, samtykti løgtingið tann 6. februar 1976, at talið av ljósmøðrum í Føroyum skuldi verða 14, soleiðis at 4 skuldu setast á Landssjúkrahúsinum, 2 á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 2 á Suðuroyar sjúkrahúsi, harav ein við bústaði í sunnara parti av oynni. Haraftrat skuldu verða 6 deildarljósmøður, 1 í Vágum, 1 í Sandoynni, 1 í Norðurstreymi, 2 í sunnara parti í Eysturoynni og 1 í norðaraparti í Eysturoynni.

Ein arbeiðsbólkur hevur síðani arbeitt við málinum, við ti fyri eyga at finna fram til hvussu skipanin skal gerast til veruleika. Eftir uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum. eru arbeiðsuppgávurnar hjá ljósmøðrunum hesar:

1. Vanligar fyribyrgjandi kanningar.
2. Arbeiði á barnakonukanningarstøð, har barnakonur kunnu venda sær til, umframt vanligar kanningar.
3. Føðifyrireikingarskeið fyri barnakonur og familju.
4. Eftirlit við barnakonum, ið eru innlagdar.
5. Barnsburðir.

Arbeiðsuppgávurnar hjá ljósmøðrum við verandi skipan eru 1 og 5.

Av ti at arbeiðsfólkið eftir ætlanini skal viðkast um, og við ti fyri eyga at skipað

verður fyri einum rimiligum vaktarbýti, hevur arbeiðsbólkurin skotið upp, at 15 ljósmøðrastørv verða í Føroyum.

Av hesum 15, skulu 4 verða á Landssjúkrahúsinum, 2 á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 2 á Suðuroyar sjúkrahúsi og haraftrat 6 fylkisljósmøður, ið skulu hava bústað, sum greitt frá omanfyri og har hava barnakonukanningar.

Haraftrat skal setast ein yvirljósmóðir, ið eftir uppskotinum skal gera tænastu á tí sjúkrahúsi, har flest barnsburðir fara fram, og har serlæknar á økinum gera tænastu.

Býtið av barnsburðum millum ljósmøður er í dag ógvuliga skeivt og í tí nýggju skipanini verður roknað við, at bert ljósmøður, ið starvaast á sjúkrahúsunum koma at hava barnsburðir. Hetta er sera vandamikið, av tí at vit sostatt framvegis fáa ljósmøður, ið hava ógvuliga fáar barnsburðir um árið, og fyri at halda kunnleikan viðlíka, krevst eitt ávíst tal á barnsburðum.

Talið á barnsburðum hevur seinastu árini verið 500-600 á Landssjúkrahúsinum og 80-100 á Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahúsi. Av tí at barnsburðartalið fyri hvørja ljósmóðir á Landssjúkrahúsinum eftir hesum er rættiliga stórt, og vísandi til omanfyri viðvíkjandi kunnleika, hevur arbeiðsbólkurin somuleiðis skotið upp, at fylkisljósmøðurnar í Eysturoynni og í Norðurstreymi býta eitt starv á Landssjúkrahúsinum, soleiðis at tær skiftast um at arbeiða á Landssjúkrahúsinum. Sostatt verður talið av ljósmøðrum á Landssjúkrahúsinum 6.

Í dag fáa ljósmøðurnar 60-65% av lønini í 17. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins og haraftrat samsýning fyri barnakonukanningar og barnsburðir. Haraftrat fáa ljósmøðurnar endurgoldið útreiðslur í sambandi við útfyllan av protokollum, útfyllingarbløðum og heilivági o.tl. Haraftrat koma endurgjøld og flutningsútreiðslur.

Omanfyri nevndu útreiðslur verða undir verandi skipan goldnar av ríkinum, landinum, kommununum og sjúkrakassanum eftir ávísum reglum.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at ljósmøðurnar fáa 100% av lønini í lønarrammu 17 og samstundis at samsýning fyri barnakonukanningar og barnsburðir fella burtur. Framhaldandi verður skotið upp, at allar útreiðslur í sambandi við skipanina verða sjúkrahúsútreiðslur, eftirsum ljósmøðurnar skulu setast á sjúkrahúsunum og heimild er til tess í sjúkrahúslógini.

Hetta fer at minka rættiliga munandi um fyrisitingina av skipanini.

Av tí at meginparturin av ljósmøðrunum er skotin upp at skula setast á sjúkrahúsunum, og at fleiri av fylkisljósmøðrunum skulu arbeiða á teimum, verður skotið upp, at allar ljósmøður fáa sjúkrahúsini sum setunarstað, og kunnu harnæst hava tænastu uttan fyri tey. Hetta førir við sær, at neyðugt er bert við einum sáttmála.

Undir verandi skipan rindar ríkið 54%, landið 24% og kommununar 22% av útreiðslunum. Eftir uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum verða útreiðslurnar býttar í helvt millum ríkið og landið, og meirútreiðslurnar hjá landskassanum í hesum sambandi og nýskipanini eru mettar til umleið 600.000 kr. um árið og hjá ríkinum umleið 100.000 kr.

ad II. Verður henda nýggja jarðamóðurskipan sett í verk, koma allar útreiðslurnar av ljósmøðruskipanini undir sjúkrahúsraksturin. Eftir núgaldandi skipan verða útreiðslurnar býttar helvt um helvt millum statin og Føroyar.

ad III. Um henda nýggja jarðamóðurskipan verður sett í verk, koma barnakonurnar at fáa sínar ferðaútreiðslur endurgoldnar frá sjúkrahúsinum.

Sí skjal 10.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 5. februar 1982 beint í socialu nevndina.

Eftir uppskoti landsstýrisins skal danska lógin nr. 627 frá 13. december 1978 um ljósmøður setast í gildi í Føroyum eins og lóg nr. 282 frá 7. juni 1972 »om svangerskabshygiejne og fødselshjælp«.

Umframt hetta, sum viðvíkur arbeiðsøki og arbeiðsviðurskiftunum hjá ljósmøðrunum er eisini ætlanin at broyta lønar- og starvsviðurskiftini.

Løgtingið hevur áður samtykt, at tað skulu vera 14 ljósmøðrastørv í Føroyum, meðan ein meiriluti í arbeiðsbólkinum, sum nú hevur viðgjørt málið, mælir til 15 størv. Ein minniluti í arbeiðsbólkinum mælir til, at tað skulu vera 18 størv.

Sosiala nevndin er samd um, at mæla til, at sett verða 16 størv sum ljósmøður í Føroyum, og setir ti fram hetta

I

Uppskot
til
samtyktar

Sett verða 16 ljósmøðrastørv í Føroyum. Størvini verða hesi:

1 yvirljósmóðir (á Landssjúkrahúsinum),
3 ljósmøður á Suðuroyar sjúkrahúsi,
3 ljósmøður á Klaksvíkar sjúkrahúsi,
3 ljósmøður á Landssjúkrahúsinum,
6 fylkisljósmøður, 1 í Vágum, 1 í Sandoynni, 1 í Norðstreymi, 2 í sunnara parti av Eysturoynni og 1 í norðara parti av Eysturoynni.

Viðmerkjast skal, at minst 1 ljósmóðir í Suðuroynni eigur at búgva í sunnaru helvt av oynni. Yvirljósmóðirin og allar fylkisljósmøðurnar skulu býta 3 størv á Lands-

sjúkrahúsinum, soleiðis at talið av ljósmøðrum har verður 6.

Lønarviðurskiftini hjá ljósmøðrunum skulu eisini umskipast. Nevndin er vorðin kunnug við, at Føroya Ljósmøðrafelag hevur limað seg inn í danska ljósmøðrafelagið. Sosiala nevndin er samd um, at lønarviðurskiftini verða at greiða við samráðingum og sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Ljósmøðrafelag.

Eisini heitir nevndin á landsstýrið um at arbeiða fyri, at øll lønarviðurskifti á heilsuøkinum verða skipað sum føroyskir sáttmálar, og at heimastýrið tekur sær av øllum fyriskipanum innan heilsuverkið og setir fram hetta.

II

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa soleiðis fyri, at allar lønaravtalur, har tað almenna er annar parturin, verða gjørdar við føroysk fakfeløg uttan danska uppílegging.

Annars mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskotini hjá landsstýrinum um nýggja ljósmøðraskipan.

Ein minniluti (Karin Kjølbro og Sverre Midjord) setir soljóðandi

III

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera tað so í bandi, at allar kvinnur fáa eina ókeypis læknakanning árliga viðvíkjandi fyribyrgjandi evnum, og at henda skipan fæst í lag frá 1. apríl 1983.

2. viðgerð 23. apríl. Vilhelm Johannesen og Jóannes Dalsgaard løgdu fram soljóðandi

broytingaruppskot

UPPSKOT
til
samtyktar

Sett verða 18 ljósmøðrastørv í Føroyum. Størvini verða hesi:

1 yvirljósmóðir (á Landssjúkrahúsinum),
3 ljósmøður á Suðuroyar sjúkrahúsi
3 ljósmøður á Klaksvíkar sjúkrahúsi
3 ljósmøður á Landssjúkrahúsinum
6 fylkisljósmøður, 1 í Vágum, 1 í Sandoynni, 1 í Norðstreymi, 2 í sunnara parti av Eysturoynni og 1 í norðara parti í Eysturoynni.

Broytingaruppskotið fall við 6-0 atkvøðum. Uppskotið frá nevndini í samtykt við 32-0 og II frá meiriluta í nevnd samtykt við 24-0, III fall við 13-0.

Landstýrisins uppskot I samtykt við 32-0, II lógaruppskotið §§ 1 og 2 samtykt við 31-0, lógaruppskotið III §§ 1 og 2 samtykt við 32-0.

3. viðgerð 23. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 923-6. Lóg nr. 83 og 84 frá 26. mai 1982.

---

89. Nýggjur maskinskúli.

Ár 1982, mikudagin 3. februar legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at lata nýggjan maskinskúla — tá hann skal byggjast — byggja í Suðuroy.

Viðmerkingar:

Tað frættist bæði í bløðum og gjøgnum útvarp, at tað er í umbúnað at byggja nýggjan maskinskúla. Hvar hesin nýggi skúli skal byggjast, er, — so vítt eg veit — ikki endaliga avgjørt. Men mær vitandi liggur hesin avgerðarrættur hjá landsstýrinum. Men sum skilst av talu og skrift, so er nokk ætlanin, at hann skal byggjast í Tórshavn.

Nú mátti tíðin verið komin, hvar ásannast má, at Tórshavnar býur ikki megnar at hýsa fleiri almennum landsskúlum, og tað hvørki so ella so.

Vit vita øll, hvussu innivist- og kostmøguleikarnir eru hjá teim næmingum, sum mugu søkja til almennar landsskúlar her í Tórshavn fyri at útvega sær neyðuga útbúgving. Hvussu trupult, ja næstan ógjørligt, tað longu í dag er hjá bæði lærarum og næmingum at útvega sær sámuliga íbúð til sámuligan pris. Hvussu leiguprísurin á burturav vánaligum íbúðum og kømurum ár frá ári óhugnaliga verður hækkaður, ja í mongum førum er vorðin til heilt óhugnaliga okursleigu. Ein beinleiðis útnyttan av

íbúðartørvinum, og hvussu lítið — fyri ikki at siga púrt onki — Tórshavnar býráð t.d. hevur gjørt fyri at bøta um henda ovurhonds stóra íbúðartørv.

Tí má tað metast púra ábyrgdarleyst, at avvarðandi politisku myndugleikar framhaldandi kroysta enn fleiri landsskúlar niður í høvuðstaðarumráðnum.

Ti tað er nú ikki bara Suðurstreymoy, sum velur politikarar inn á ting, men alt landið. Og hava hesir veljarar kring landið eitt rættvíst krav um, at tá teirra børn mugu flyta heimanífrá eina tíð fyri at útvega sær útbúgving, at børnini tá hava møguleika til at útvega sær sámuligt innivist, og ikki verða útnyttað sum ein vanlig handilsvøra og verða noydd til at gjalda órímiliga høga leigu fyri sera vánaligt innivist. Umframt tað, at hesi ungu allar oftast eru hart spent fyri fíggjarliga séð, og oftast mugu foreldur hjálpa til eftir førimuni.

Um ein slíkur skúli — maskinskúli — verður lagdur í Suðuroy, so er ongin ivi í, at ein og hvør kommuna í oynni vildi kappast um at útvega bæði lærarum og næmingum sámuligar íbúðir til sámuligan prís.

Viðvíkjandi praktiskari útbúgving innan maskinøkið, so liggur oyggin ikki stórt aftanfyri høvuðstaðarumráðið, ti har eru skip í øllum maskinstøddum, maskinverkstøð, smiðjur og skipasmiðjur, og nú væntandi eisini ein nýmótans skipasmiðja.

Eisini vildi hetta verið í tráð við tann fortannlaga orðavavstur um »bygdamenning« og »oyggjamenning«. Tí øllum kunnugt so er t.d. sunnan Kirkjubønes onki alment oyra dottið niður á hesum og líknandi øki. Eisini ásannandi, at fyrsti sjómansskúli og navigatiónsskúli í Føroya søgu lá í Suðuroy — í Porkeri — men varð hann, sum so mangt annað, dragsaður úr Suðuroy til Havnar, har landsins politikarar gjøgnum tíðirnar hava skapað eina ovurhonds almenna landsniðurseting, og teir bliva við, alt til ampa fyri Tórshavnar býráð, sum ómøguliga kann halda fram við at lúka tey krøv, sum politikararnir uttan framskygni hava hálvt niður yvir Tórshavnar býráð.

1. viðgerð 23. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 23. apríl lagði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, 3. februar 1982 og undir 1. viðgerð 23. februar 1982 beint skúlanevndina.

Skúlanevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Óli Breckmann, Ivan Johannesen og Hilmar Kass) setir eingi uppskot fram í hesum máli.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen) mælir til at samtykkja uppskotið frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni.

Ein annar minniluti (Jóannes Dalsgaard) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) legði fram soljóðandi

MINNILUTAÁLIT

Minnilutin kann í prinsippinum taka undir við hugsanini um at decentralisera ein part av tí víðarigangandi útbúgvingini í Føroyum.

Minnilutin ásannar, at tað er av týdningi fyri ta hægru útbúgving, sum longu er í Suðuroy, at aðrir og helst alternativir skúlaformar verða settir á stovn í oynni — skúlar, sum kunnu samarbeiða við verandi skúlar.

Minnilutin metir tó, at ein slík decentralisering eigur at fara fram eftir eini plan legging og í samráð við avvarðandi skúlar og skúlamyndugleikar. Í hesum sambandi minnir minnilutin á, at tað situr ein nevnd undir landsskúlafyrisitingini og arbeiðir við útbúgving teirra 16-19 ára gomlu og somuleiðis situr sama nevnd og ger uppskot til cina decentraliseringsætlan av hægra skúlaverkinum. Tað má tí metast at vera beint, at uppskotið um at flyta maskinskúlan til Suðuroyar verður beint til hesa nevnd við tí viðmerking, at løgtingið ynskir alternativ útbúgvingartilboð sett á stovn í Suðuroy.

Minnilutin setir tí hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at senda uppskotið um maskinskúla í Suðuroy til útbúgvingarnevndina fyri tey 16-19 ára gomlu og mælir nevndini til at taka uppskotið við í sini útbúgvingarætlan fyri Suðuroy ella til at taka annan vinnuligan skúla við í sini ætlan fyri hesa oyggj.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið fall við 15-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá Jóannesi Dalsgaard fall við 16-0 atkvøðum.

90. Broyting í løgtingslóg um íbúðagrunn.

Ár 1982, mikudagin 3. februar legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íbúðagrunn.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 100 frá 1. december 1978 um íbúðagrunn verða gjørdar hesar broytingar;

1. Í § 1 verður aftaná orðið »bygging« sett: »ella keypi«.

2. § 2 verður orðað soleiðis:

»Grunnurin er sjálveigandi stovnur og verður fyrisitin av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin. Fyri hvørja íbúðarbygging velur kommunan/kommunurnar 2 limir og 2 tiltakslimir. Valið er galdandi fyri 4 ár.«

3. Í § 3, 2. stk. verður aftaná orðið »íbúðarbygging« sett: »ella keypi«.

4. Í § 4, 1. stk. gongur 1. punkt út og í staðin verður sett: »Kommunurnar saman við íbúðargrunninum taka stig til at byggja/keypa íbúðahús«.

5. Í § 4, 2. stk. verða orðini »bygging av íbúðarhúsum« broytt til: »íbúðahús«.

6. Í § 4, 3. stk. verður aftaná orðið »bygging« sett: »ella keyp«.

7. Í § 4, 4. stk., verða orðini »letur byggja« broytt til: »útvegar«.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om boligfond.

§ *1.* I lagtingslov nr. 100 af 1. december 1978 om boligfond foretages følgende ændringer:

1. I § 1 indsættes efter ordet »opførelse«: »eller køb«.

2. § 2 affates således:

»Fonden er selvejende institution og styres af bestyrelsen for huslånefondet. For hvert boligbyggeri vælger kommunen/kommunerne 2 suppleanter. Valgperioden er 4 år.«

3. I § 3, stk. 2 indsættes efter ordet »boligbyggeri«: »eller køb«.

4. I § 4, stk. 1 udgår pkt. 1 og i stedet indsættes: »Kommunerne sammen med boligfonden tager initiativ til at bygge/købe boligejendomme.

5. I § 4, stk. 2 ændres ordene »opførelse af boligejendomme« til: »boligejendomme«.

6. I § 4, stk. 3 indsættes efter ordet »byggeri«: »eller køb«.

7. I § 4, stk. 4 ændres ordene »lader opføre« til »tilvejebringer«.

8. Í § 5 gongur 3. stk. út.

9. Í § 10 verður í báðum førum orðini »bygd« broytt til »útvegast«.

10. Í § 14, 1. stk., verður aftaná orðið »bygging« sett: »ella keyp«.

11. Í § 16 gongur litra c út.

12. Í § 18, 1. stk., verða orðini »verða rentur út yvir 5% av lánum« broytt til: »verður helvtin av rentum av lánum«.

13. § 19 verður orðað soleiðis:

»Íbúðagrunnurin kann útvega íbúðir, ið eru ætlaðar fólki við serligum sosialum tørvi.

2. stk. Til útvegan av slíkum íbúðum kunnu feløg, góðkend av landsstýrinum, átaka sær heilt ella lutvist uppgávuna hjá kommunu eftir hesi lóg og fáa tilsvarandi ávirkan á leiðslu v.m.

3. stk. Fyri hesar íbúðir eru reglurnar í § 4, 5. stk., og § 8 ikki galdandi.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

8. I § 5 udgår stk. 3

9. I § 10 ændres ordene »opføres« og »opført« til henholdsvis: »tilvejebringes« og »tilvejebragt«.

10. I § 14, stk. 1 indsættes efter ordet »opførelse«: »eller køb«.

11. I § 16 udgår litra c.

12. I § 18, stk. 1 ændres ordene »bliver overskydende rente over 5% for lån« til: »bliver halvdelen af renterne af lån«.

13. § 19 affattes således:

»Boligfonden kan tilvejebringe lejligheder tiltænkt personer med særlig sociale behov.

Stk. 2. Til tilvejebringelse af sådanne lejligheder kan foreninger, godkendt af landsstyret, påtage sig helt eller delvis kommunens opgave efter denne lov og få tilsvarende indflydelse på ledelse m.v.

Stk. 3. For disse lejligheder er reglerne I § 4, stk. 5, og § 8 ikke gældende.«

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 100 um íbúðagrunn er frá 1. december 1978.

Peningurin er settur av á fíggjarløgtingslógini í 1979/80 5 milj. kr., í 1980/81 1,5 milj. kr. og í 1981/82 1,5 milj. kr.

Eingi er brúkt úr grunninum. Sostatt eru 8 milj. kr. í grunninum í dag.

Høvuðsbroytingarnar í hesum lógaruppskotinum eru:

1. Fyrisitingn av Íbúðagrunninum verður løgd undir Húsalánsgrunnin. Húsalánsgrunnurin hevur nevnd og umsiting, sum longu virkar. Hetta skuldi lætt um at fingið íbúðagrunnin at virka og skuldi samstundis spart fyrisitingarútreiðslur.

2. Onnur høvuðsbroytingin javnsetir keyp av hóskandi húsum til íbúðir við bygging av íbúðahúsum.

3. Triðja høvuðsbroytingin inniber, at eisini feløg, góðkend av landsstýrinum (her verður hugsað um t.d. áhugafeløg av brekaðum fólki) kunnu heilt ella lutvist

átaka sær uppgávuna hjá kommununum eftir hesi lóg at byggja ella keypa íbúðahús til fólk við serligum sosialum tørvi og í hesum førum fáa tilsvarandi ávirkan á leiðsluna sum kommunurnar. Hjá hesum fólkum verður ikki neyðugt at keypa íbúðina.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 19. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð hin 5. februar 1982 beint í sosialu nevndina.

Høvuðsbroytingin í lógini er, at stýrið fyri Húsalánsgrunnin eisini skal vera tann landsstýrisvaldi og løgtingsvaldi parturin av íbúðagrunninum, meðan kommunur fyri hvørja íbúðabygging sær velja 2 limir og 2 tiltakslimir í stýrið. Í ávísum førum kunnu feløg (við sosialum endamáli) vera við til íbúðabygging og velja stýrislimir á sama háttt sum kommunur. Eisini kemur lógin í framtíðini at galda fyri keyp av íbúðahúsum.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. mars. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 53: Íbúðagrunnur.

§ 1 samtykt við 27-0 atkvøðum, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 1. apríl. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1426-13-1. Lóg nr. 66 frá 11. mai 1962.

91. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Ár 1982, mikudagin 3. februar legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar,

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 29. januar 1982 millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Viðmerkingar:

Sambært skipanina millum Føroyar og Noreg um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (løgtingsmál nr. 49/1976) skulu partarnir fyri eitt ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu um sínámillum fiskiskap í 1982 byrjaðu í Bergen 3. december 1981, hildu fram í Keypmannahavn 16. januar 1982 og endaðu í Bergen 29. januar 1982. Partarnir samdust tá um viðløgdu skipan. Samanumtikið eru nøgdirnar, sum partarnir loyva veiddar á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum nakað størri í 1982 enn tær vóru í 1981.

Fyri veiðuna av vanligum matfiski ber skipanin fyri 1982 í sær,

at føroysk skip á norska landgrunninum norðanfyri 62° n.br. og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard fáa loyvi at veiða 5.500 tons, harav toskur 3.800 tons, hýsa 500 tons og annar fiskur 1.200 tons (í 1981 tilsamans 5.900 tons, harav ávikavist 4.100 tons av toski, 600 tons hýsa og 1.200 tons av øðrum).

Harumframt er sunnanfyri 62° n.br. loyvt at veiða 1.200 tons av upsa (1981 1.500 tons).

Umframt norsku toskakvotuna í Barentshavinum er avtalað, at 3.900 tons av tí kvotu, ið føroyingar hava fingið frá Sovjetsamveldinum kunnu veiðast í norskum sjógvi (í 1981 2.700 tons). So statt kunnu alt 7.700 tons av toski verða veidd sambært sáttmálan, mótvegis 6.800 tons í 1981.

Norsk skip fáa í føroyskum sjógvi loyvi at veiða 7.000 tons av botnfiski mótvegis 8.000 tonsum í 1981. Hesin fiskiskapur skal miða ímóti at veiða longu, brosmu, blálongu og upsa, meðan toskur bert í minni mun má veiðast sum hjáveiða. Eins og í 1981 kunnu í mesta lagi 2.000 tons vera upsi.

Viðvikjandi sínámillum fiskiskapi av ídnaðarfiski ber skipanin í sær, at føroysk skip fáa loyvi at veiða 20.000 tons, mótvegis 18.000 tonsum í 1981, av hvítingsbróður, nebbasild, svartkjafti og brislingi. Av hesum 20.000 tonsunum má veiðan av brislingi í mesta lagi verða 3.000 tons (somu nøgd sum í 1981). Haraftrat er loyvt føroyskum skipum í royndarfiskiskapi at veiða upp til 5.000 tons av svartkjafti (áður bert við nót). Av lodnu verður loyvt í Barentshavinum og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard at veiða 15.000 tons, harav upp til 5.000 tons sum vetrarlodna (sama nøgd sum í 1981).

Eftir at Noreg í 1980 setti 200 fjórðinga fiskimark rundan um Jan Mayen, ynsktu føroyingar at fáa kvotur á hesum fiskiøki, ið kundu loyva framhaldandi veiðu har. Sambært avtaluna kunnu føroyingar í 1982 veiða 5.000 tons av svartkjafti við Jan Mayen (sama nøgd sum í 1981). Av lodnu høvdu føroyingar eina kvotu við Jan Mayen upp á 2.500 tons í 1981. Vegna væntandi lágt TAC í 1982 vildu norðmenn ikki bjóða nakra kvotu fyri 1982, men søgdu teir seg til reiðar at umhugsa spurningin av nýggjum, tá ið TAC fyri 1982 var ásett.

Fyri 1982 er avtalað ein sínámillum royndarveiða av makreli innanfyri eina kvotu uppá 4.000 tons til hvønn partin (í 1981: 1.000 tons).

Norsk skip fáa loyvi at veiða 71.000 tons av svartkjafti (í 1981: 68.000 tons) við tilsamans 60 skipum (sum í 1981). Av skipunum mugu bert 16 (sum í 1981) verða á fiskileið í senn, umframt 10 (sum í 1981), ið hava loyvi til at leita eftir svartkjafti uttanfyri eina av vaktar- og bjargingartænastuni til eina og hvørja tíð ásetta høvuðsfiskileið. Av nevndu nøgd av svartkjafti kunnu 15.000 tons (1981: 5.000 tons) veiðast uttan fyri tíðarskeiðið 10. apríl (1981: 15. apríl) til 10. juni.

Í 1982 er norska brugduveiðan undir Føroyum fyri fyrstu ferð komin inn í sáttmálan (kvota: 150 tons av livur).

Samanborið við 1981 eru broytingar viðvikjandi ídnaðarfiskiskapi og makreli eyðkendar av, at føroysk skip í norskum sjógvi í 1982 ikki fáa loyvi at veiða makrel við tí grundgeving, at vegna ta ógvuliga lágu totalkvotu í 1982 fyri makrel í Norðsjónum, kundi Noreg ikki láta Føroyar fáa eina slíka. 0-kvotan skuldi sambært orðingina í avtaluni ikki verða prejudiserandi viðvikjandi spurninginum um tilluting av makrelkvotu til Føroyar komandi ár (Í 1981: 1.000 tons). Somuleiðis varð sum nevnt eingin lodnukvota avtalað við Jan Mayen, vegna ta eftir norskum tykki veiku støðuna hjá lodnustovninum. Tó varð í avtaluni orðað, at um Noreg setti eina netto kvotu fyri norskari veiðu í 1982, skuldi Noreg kanna spurningin um møguliga lodnukvotu til Føroyar. Ovfisking í 1981 skuldi dragast frá møguligari kvotu í 1982. (Veiða í 1981: 2.867 tons).

Eitt yvirlit yvir tey skip, ið ætla at taka luf í sínámillum fiskiskapinum í 1982 skal verða avvarðandi føroyskum og norskum myndugleikum í hendi innan 1. mars 1982.

Sí skjal 11.

1. viðgerð 4. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 5. februar legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landstýrinum tann 3. februar 1982 og undir 1. viðgerð tann 4. februar 1982 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 5. februar viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Jógvan Olsen, Svend Age Ellefsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Jørgin Thomsen tekur undir við meirilutanum, men hevur tó hesar viðmerkingar:

Tað kom týðiliga fram undir nevndarviðgerðini, at í veruleikanum er sáttmálin verri enn undanfarin ár.

Vísast kann á, at ein partur av loyvdu veiðuni (toskur) er fluttur úr ti sáttmála, ið vit hava við USSR, og sum vit hava goldið fyri framman undan.

Eisini kann vísast á, at í fyriliggjandi uppskoti er eingin makrelveiða loyvd í Norðsjónum, og Javnaðarflokkurin er serliga ivingarsamur, um vit heldur ikki fáa loyvi at veiða lodnu við Jan Mayen, og metir hann hetta vera ein reynd frá norskari síðu at forða føroyingum at luttaka í eini framtíðar lodnuveiðu á hesum øki.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Petur Reinert) førir fram:

Niðurstøðan í viðmerkingunum frá landsstýrinum til hetta mál má sigast at vera beinleiðis villleiðandi.

Samanborið við tað, sum løgmaður førdi fram undir 1. viðgerð av málinum, mátti tingið fáa ta fatan, at uppskotið til skipan millum Føroya og Noregs um sínámillum fiskirættindi í 1982 bar í sær størri fyrimunir enn skipanin, sum var galdandi í 1981.

Við at sambera tølini fyri idnaðarfiskiveiði siggja vit, at vit skulu luta 71.000 tons fyri 45.000 tons.

Norðmenn fáa loyvi at fiska 3.000 tons meira av svartkjafti, samstundis fáa vit loyvi at fiska 2.000 tons meira av idnaðarfiski í suðurnorskum øki, men samstundis missa vit rættin at fiska 2.500 tons av lodnu við Jan Mayen og 1.000 tons av makreli í norskum sjóaøki.

Ella tilsamans 1.500 tons færri enn seinasta ár, og tey 1.000 tonsini av makreli vega serliga tungt, tá hugsað verður um prísin á makreli sammett við prísin á idnaðarfiski.

Viðvikjandi botnfiskinum fáa vit munandi niðurskurð 6.700 tons móti 7.400 tonsum.

Í hesum føri verða norðmenn at minka teirra veiði undir Føroyum við 1.000 tonsum til 7.000 tons.

Seta vit møguleikarnar upp hvør móti øðrum, siggja vit hesa mynd

	Føroyar	*Noreg*
av botnfiski	6.700 tons	7.000 tons
av idnaðarfiski	45.000 tons	71.000 tons

Tað má vera hvørjum tingmanni púra greitt, at her er eingin javnvág.
Í fyrsta lagi gjalda vit dýrt fyri at sleppa at royna á norskum øki.
Í øðrum lagi er uppskotið fyri 1982 væl lakari enn møguleikarnir í 1981.
Sostatt kann minnilutin ikki taka undir við landsstýrisuppskotinum.

2. viðgerð 5. februar. Uppskot frá Adolf Hansen um at beina málið aftur í nevnd fall við 18 atkvøðum ímóti.

Uppskotið frá landsstýrinum varð samtykt við 22 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

F.I., j.nr. 1500-4-2.

---

92. Fyrispurningur til løgmann.

Ár 1982, hósdagin 4. februar boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, soljóðandi

FYRISPURNINGUR
til
løgmann

1. Nær verður fundur millum Ídnaðargrunnin og Landsstýrið, so avklárast kann, hvørvitt Ídnaðargrunnurin vil vera við til íløgufígging av smoltstøð ella ikki?
2. Um íløgufígging ikki fæst yvir Ídnaðargrunnin, hvussu hevur løgmaður sær hugsað sær, at henda fígging kann fara fram?
3. Nær kunnu smoltstøð og alarar fáa at vita, hvussu henda fløkja kann loysast.

Viðmerkingar:

Ein og hvør er vitandi um, hvussu stóran tørv, vit hava á laksasmolti, síðan ali-

støðir fóru í gongd, og at avgjørt er, at vit eisini skulu seta smolt út í havið.

Alistøðirnar hava ongantíð fingið nær ella námin tað smolt, sum átti at verið sett við á hvørjum ári, og úrslitið av hesum er, at alistøðirnar framhaldandi koyra við stórum rakstrarláni, minst eitt ár longur enn neyðugt, og er hetta ein tung figgjarlig óneyðug byrða fyri alistøðirnar. Meðan tær hinvegin, um nóg nógv av smolti kundi útvegast, høvdu hvílt í sær sjálvum eftir 3 árum um ikki fyrr.

Orsøkin hevur verið tann, at tað er bannað at innflyta smolt, og at smoltstøðin við Áir hevur ikki verið før fyri at nøkta tørvin vegna plásstrot og av øðrum orsøkum.

Nú er so komið til ta loysn, at alistøðin við Áir kann innflyta troðin rogn, klekja tey og startfóðra tey — til kombikk stødd — í heilt stórum nøgdum. Selja kombikkini til smærri smoltstøðir og fóðra viðari til smoltstødd, sum so verður selt til laksualarar. Ein alisgongd, sum m.a. norðmenn nú nýta og viðmæla. Teir hava jú munandi størri royndir á hesum øki, enn vit hava í dag.

Við nevndu alisgongd verður verandi kapasitetur munandi betur útnyttaður og við munandi figging til íløgu og rakstur. Alingin verður býtt upp í 3 sundurgreinað stig og tryggjað verður alingini besta slag — racu — av alifiski.

Áðrenn ólavsøku í fjør varð felag stovnað, sum skuldi gera og reka eina smoltstøð til í mesta lagi 150-200.000 smolt. Aftaná at øll neyðug skjøl, so sum loyvir o.a. vóru í lagi, gav landsstýrið felagnum virkisloyvi, og søkti felagið grunnarnar um vanliga figging: (Vanligt: Ídnaðargrunnurin størsta partin av íløgunum og Menningargrunnurin minni íløgur og allan raksturin). Rogn vórðu biløgd gjøgnum alistøðina við Áir.

Menningargrunnurin játtaði beinan vegin rakstrarlán, meðan Ídnaðargrunnurin enn ikki hevur tikið principiella støðu til smoltstøð, vegna tørvandi samráðingar við landsstýrið

Farið varð undir beinan vegin at gera hesa smoltstøð, men nú er langt síðan at eginpeningur og privat lán eru uppbrúkt, og menn eru læstir fastir vegna tørvandi pening til reinsi- og hitaaggregat o.a., sum skal gjaldast kontant. Rognini komu aftaná jól, eru útklækt og verða nú startfóðrað norðuri við Áir.

Um ikki fløgufiggjan verður í lagi fyrsta dagin, so verður smoltstøðin ovbyrjað og sett aftur eitt ár við óneyðugum rakstrarútreiðslum. Hetta viðvíkur sjálvandi øllum verandi alistøðum, eins og onki smolt verður tøkt at seta út í havið.

Alt vegna tørvandi støðutakan og virkisfýsni hjá ídnaðarmálaráðharranum Paula Ellefsen, harra løgmanni, sum av einslistum hevur tikið hetta málsøkið: Laksa- og silaaling, uppá seg sum eitt privat landsstýrisøki. Tess vegna loyvi eg mær at stilla harra løgmanni hesar spurningar.

5. februar varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

12. februar svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 92/1981 hevur Ove Mikkelsen, løgtingsmaður sett mær hesar spurningar:

1. Nær verður fundur millum idnaðargrunnin og landsstýrið, so avklárast kann, hvørvitt idnaðargrunnurin vil vera við til íløgufígging av smoltstøð ella ikki?
2. Um íløgufígging ikki fæst yvir idnaðargrunnin, hvussu hevur løgmaður so hugsað sær, at henda figging kann fara fram?
3. Nær kunnu smolstøð og alarar fáa at vita, hvussu henda fløkja kann loysast?

Viðv. 1. spurningi:

Fríggjadagin 5. februar bað idnaðargrunnurin um fund við landsstýrið um nevndu viðurskifti.

Fundurin verður hildin týsdagin 9. februar.

Viðv. 2. spurningi:

Ætlan landstýrisins er, at fígging av tílíkum støðum kann fremjast av idnaðargrunninum og menningargrunninum.

Upplýsast kann, at landsstýrið hevur borið so í bandi, at hesir báðir grunnar fáa lán uppá tilsamans einar 50 milj. kr. úr Nordiska Investeringsbanken.

Sostatt verða grunnarnir førir fyri at fíggja tey fyrstu anleggini av hesum slagi.

Viðv. 3. spurningi:

Sagt er mær, at fær umsóknir, sum komnar eru til idnaðargrunnin, eru undir viðgerð. So skjótt viðgerðin er lokin, fer grunnurin at geva boð til umsøkjararnar.

---

93. Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna.

Ár 1982, hósdagin 4. februar legði Juul Jacobsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at bera so í bandi, at fiskavirkir, sum ikki hava útflutningshavn, fáa 60 oyru/kg fyri flak og 40 oyru/kg fyri saltfisk.

Viðmerkingar:

Løgtingsmál nr. 54/1980 (vetrarting): Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna ljóðar soleiðis:

»Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við fiskaútflytarar at bera so í bandi, at flutningsútreiðslurnar frá framleiðara til útflutnings verða tær somu um alt landið.«

Hetta uppskot fekk fulla undirtøku á tingi, men onga frá landsstýri og fiskaútflytarum. Sostatt er støðan tann sama og ikki til at halda út fyri tey virkir, sum eru á plássum, har útflutningshavn ikki er. Allir flokkar góðtaka bygdamenning og við ti í huga, vóna vit góða undirtøku.

1. viðgerð 10. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina. Málið ikki aftur komið.

---

94. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann.

Ár 1982, hósdagin 4. februar boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Juul Jacobsen, løgtingsmanni, soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Kunnu útoyggjarnar í Suðurstreym: Nólsoy, Hestur og Koltur ikki fáa somu sømdir við ferðaseðlunum og farmagjøldum sum aðrar útoyggjar her á landi.

Viðmerkingar:

Hetta er ein løgin spurningur, men hetta er so sanniliga eisini ein løgin viðferð, hesar oyggjar hava fingið frá avvarðandi myndugleikum í hesum máli. Vónandi fái eg eitt svar, hví so er, og um tað framvegis skal vera so.

5. februar varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

23. februar svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

SVAR

Spurt verður, um útoyggjarnar í Suðurstreym: Nólsoy, Hestur og Koltur kunnu fáa somu sømdir við ferðaseðlum og farmagjøldum sum aðrar útoyggjar her á landi.

Eg havi kannað, hvør munur kann vera gjørdur á teimum ymisku útoyggjunum.

Viðvíkjandi ferðaseðlunum er at siga, at prísurin til nevndu 3 øki er 15 kr., meðan hann í Norðoyggjum og til Mykines er 10 kr. fyri tey, sum búgva á staðnum. Av tí, at tað til hesi pláss ofta er trongligt við bátunum um summarið orsakað av fremmandum ferðafólki, er ferðaseðilin dupult so dýrur fyri tey, sum ikki búgva á hesum útoyggjum.

Farmagjøldini til útoyggjarnar eru tey somu fyri øll plássini, meðan tey eru ikki tey somu fyri øll kolli. T.d. kostar ein sekkur av fóðuri 4 kr., um hann verður fluttur til Trøllanes ella til Nólsoyar. Haraftrat kemur 1 króna fyri farmabrævið og 2 krónur fyri ferming, soleiðis at minstagjaldið fyri eitt kolli verður 7 krónur. Har avgreiðslumaður er (tað er tað í Nólsoy, men ikki t.d. á Trøllanesi) eru harumframt 2 kr. í avgreiðslugjaldi. Soleiðis verður tað samlaða gjaldið ongantíð minni enn 9 kr., og er hetta líka fyri øll pláss.

Annars er ymist, hvat størri lutir kosta, t.d. eitt køliskáp 30 kr. og ein kálvakroppur ella eitt krov 10 kr. Hetta er eisini eins fyri øll pláss.

---

95. Stovnan av helikoptaragrunni.

Ár 1982, hósdagin 4. februar legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburðs og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um stovnan av helikoptaragrunni.

§ 1

Settur verður á stovn grunnur, nevndur Helikoptaragrunnurin, hvørs endamál er at keypa og reka helikoptara.

§ 2

Uppgáva grunnsins er við helikoptara at røkja:

a) bráðneyðugan sjúkraflutning,
b) vaktar- og bjargingartænastu,
c) fólka- og farmaflutning til útoyggjar og útbygdir.
d) leiguflutning og
e) annað.

§ 3

Ein og hvør í Føroyum skrásett og/ella virkandi fyritøka, felag og persónur skulu av ársavlopinum, eftir skatt, men áðrenn burturlegging, avskriving og vinningsbýting, gjalda hesi avgjøld til Helikoptaragrunnin:

20% av avlopinum yvir 10 mill. kr.
15% av avlopi millum 5 og 10 mill. kr.
10% av avlopi millum 1 og 5 mill. kr.

2. stk. Avgjøld eftir 1. stk. í hesi § falla til gjaldingar 3 mánaðir eftir at viðkomandi roknskapur er lokin.

3. stk. Brot á hesa § verða at avgreiða sum brot á skattalógina og sambært henni.

lagtingslov om oprettelse af helikopterfond.

§ 1.

Der oprettes en fond, kaldet Helikopterfonden, med det formål at købe og drive helikopter.

§ 2.

Fondens opgave med helikopteren er at passe:

a) akut sygetransport
b) vagt- og bjærgningstjeneste,
c) folke- og varetransport til udøer og udbygder,
d) lejetransport og
e) andet.

§ 3

Enhver på Færøerne registreret og/eller virkende virksomhed, selskab eller person skal af årsoverskudet efter skat, men før henlæggelser, afskrivning og udbytte, betale følgende beløb til Helikopterfonden:

20% af overskudet over 10 mio. kr.
15% af overskud mellem 5 og 10 mio. kr.
10% af overskud mellem 1 og 5 mio. kr.

Stk. 2. Afgifter efter stk. 1 i denne § forfalder til betaling 3 måneder efter at vedkommende regnskab er afsluttet.

Stk. 3. Overtrædelse af denne § behandles som overtrædelse af skatteloven og i henhold til denne.

§ 4

Grunnurin verður stjórnaður av ella undir eftirliti av eini 5-mannanevnd, vald soleiðis:

2 av Føroya Løgtingi
1 av Vaktar- og Bjargingartænastuni (formaður)
1 av Sjúkrahúsverkinum og
1 av Strandferðsluni

§ 4

Fonden bestyres af eller under tilsyn af et 5-mands udvalg, valgt således:

2 af Færøernes Lagting
1 af Vagt- og Bjærgningstjenesten (formand)
1 af Sygehusvæsenet
1 af Kystfarten.

§5

Nevndin ger reglugerð um dagligu fyrisiting grunnsins v.m., ið verður at góðkenna av landsstýrinum saman við løgtingsins figgjarnevnd.

§ 5

Udvalget udfærdiger instruks for den daglige administration af fonden m. m., der skal godkendes af landsstyret sammen med lagtingets finansudvalg.

§ 6

Henda lóg hevur gildi frá 1. mars 1982.

§ 6

Denne lov har virkning fra den 1. marts 1982.

Viðmerkingar:

Seinasta ár varð gjørd ein roynd við helikoptaranum »TYRLA« at fáa reglubundið ferðasamband við útoyggjar og úthygdir. Henda roynd eydnaðist væl, um enn hon var dýr.

Váða planlegging frá landsstýrisins síðu áðrenn og undir royndini førdi til, at helikoptaraflutningurin ikki helt á fram. Her skulu verða drigin fram nøkur av teim mest fatalu mistøkum landstýrisins í helikoptaramálinum.

1) Landsstýrið gloymdi, at útreiðslur til vegir, brýr, tunellir, skip, bilar og annað, ið nýtt verður til almenna samferðslu ikki verður bókað sum samferðslu útreiðslur, men sum samferðslu fløgur, og av hesi orsøk kom talvilfarið frá »Tyrlu« at geva eina skeiva mynd.
2) Stórar nøgdir av olju kundu verið spardar hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, um helikoptarin partvíst var nýttur istaðin fyri skipini.
3) Ongin innsøka var tryggjað helikoptaranum á sama hátt sum øðrum rakstrargøgnum undir landinum og stovnum tess.
4) Ov lítil dentur var lagdur á flutning av framleiðsluni hjá teimum sum búleikast í útjaðarøkjunum, mótvegis t.d. touristum.
5) Landsstýrið gloymdi, at peningurin ikki streymar frá Tórshavn og úteftir, men frá útjaðarunum og inneftir.

Útjaðaraøkini eru seinastu árini gliðin so nógv afturút viðv. samferðslu í mun til onnur økir, at nú er upp á tiðina, at eisini tey sleppa at smakka vælferðina.

Tað finnast fyritøkur, feløg og kanska eisini einstaklingar, sum í beinleiðis ársavlopi hava frá 100 til 1.000 kr pr. borgara í Føroyum. Størsti parturin av hesum peningi kemur beinleiðis og óbeinleiðis frá teimum, sum búgva við útjaðaran. Tað er tí einki forgjørt í, um tingið áleggur tílíkum fyritøkum, feløgum og persónum eitt lítið avgjald av teimum fyrimunum, hesi hava fingið í samfelagságóðanum. Hetta er í roynd og veru ikki annað enn ein afturbering (dividende).

Samsvarandi hesum verður uppskotið lagt fyri tingið.

1. viðgerð 9. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Adolf V. Hansen tann 4. februar 1982 og undir 1. viðgerð tann 9. februar beint í figgjarnevndina.

Nevndin býtti seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann og Frederik Olsen) metir, at tá landsstýrið hevur loyst hetta mál, verður mett, at tað er óneyðugt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Minnilutin (Atli Dam og Ove Mikkelsen) tekur støðu í tingsalinum, meðan minnilutin (Juul Jacobsen) tekur undir við fyriliggjandi lógaruppskoti.

2. viðgerð 19. apríl. § 1 fall við 14-0 og § 3 fall við 10-0. Uppskotið sostatt burturdottið.

---

96. Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging

Ár 1982, hósdagin 4. februar legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 85 frá 24. oktober 1978 um rentustudning til samansparing til húsabygging verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:

»Úr landskassanum verður latin rentustudningur til uppsparing, ið hevur til endamáls at spara saman til sethúsa- og íbúðabygging ella keyp, og til keyp av grundstykki til sethúsa- ella íbúðabygging.«

2) Í § 3, 2. stk. verður »10.000 kr.« broytt til »20.000 kr.« og »50.000 kr.« broytt til »100.000 kr.«

3) Í § 4 verður »50.000 kr.« broytt til »100.000 kr.« og »1½% p.a.« verður broytt til »2% p.a.«

4) § 5, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Tá ið rentustudningur er tilskrivaður, kann kontoeigari ikki taka út, avhenda ella á annan hátt ráða yvir innskotunum ella tilskrivaðum rentustudningi uttan so er, at innskot og rentustudningur prógvandi verður nýtt sambært endamálinum í § 1. Loyvt er undir tí nevndu fyritreyt at taka út v.m. ein part. Heldur ikki kann verða gjørd figgjartøka, útpanting ella lagt hald á innskot ella rentustudning.«

5) § 5, 4. stk. verður orðað soleiðis:

»Um samasparingin øll ella partur av henni ikki, áðrenn 12 ár eru gingin frá fyrsta innskotsdegi, er

lagtingslov om ændring i lagtingslov om rentetilskud til opsparing til boligbyggeri.

§ *1.* I lagtingslov nr. 85 fra 24. oktober 1978 om rentetilskud til opsparing til boligbyggeri foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:

»Af landskassen ydes rentetilskud til opsparing, der har det til formål at opspare til opførelse af beboelseshus og lejligheder eller køb, og til køb af byggegrund til beboelseshus- og lejligheder«.

2) I § 3, 2. stk. ændres »10.000 kr.« til »20.000 kr.« og »50.000 kr.« til »100.000 kr.«

3) I § 4 ændres »50.000 kr.« til »100.000 kr.« og »1½% p.a.« til »2% p.a.«

4) § 5, 1. stk. affattes således:

»Efter at rentetilskudet er tilskrevet, kan kontohaveren ikke hæve, overdrage eller på anden måde råde over indskudene eller tilskrevne rentetilskud medmindre indskud og rentetilskud bevisligt anvendes i henhold til formålet i § 1. Delvis hævning m.v. under den anførte forudsætning kan også finde sted. Der kan heller ikke foretages udlæg, udpantning eller arrest i indskud eller rentetilskud«.

5) § 5, 4. stk. affattes således:

»Såfremt indskudet helt eller delvis ikke inden 12 år fra første indskudsdato er anvendt i henhold

nýttur sambært endamálinum í § 1, verður tann parturin av samansparingini, ið eftir er, givin leysur.«

til formålet i § 1, frigives den del af opsparingen, der står tilbage.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1982.

§ 2. Denne lov træder i kraft 1. april 1982.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 85 frá 24. oktober 1978 er ásett, at fólk, sum hava samansparing av peningi á serstakari konto í føroyskum bankum og sparikassum við tí endamáli at spara saman til húsabygging, fáa ein rentustudning úr landskassanum upp á 1 1/2% p.a.

Treytin fyri at fáa henda rentustudning er, at viðkomandi sparari ikki er yngri enn 16 ár, at hann er undir fullari skattskyldu í Føroyum, at peningurin verður settur inn upp á hægstu rentu, og at samansparingin og rentustudningurin ikki verða nýtt til annað endamál enn til sethúsa- og íbúðabygging. Í lógini eru eisini ávísar avmarkingar. T.d. má árliga innskotið, ið kemur undir rentustudning, ikki fara upp um 10.000 kr. og samlaða samansparingin, sum kemur undir reglurnar um rentustudning, er í mesta lagi 50.000 kr.

Sum nevnt hevur lógin verið í gildi síðani 1978. Leysliga hevur javnaðarflokkurin kannað eftir, í hvussu stóran mun hesin møguleikin fyri samansparing verður nýttur, og er flokkurin komin til tað úrslit, at tað bert er eitt ógvuliga avmarkað tal av fólki, ið hevur gjørt nýtslu av hesum møguleika. Flokkurin metir, at tað, sum mest av øllum forðar fyri, at hesin møguleiki ikki verður nýttur í nógv størri mun, er at samansparingin bert kann verða nýtt til sethúsa- ella íbúðabygging og ikki til keyp av grundstykki.

Tað, sum er fløskuhálsurin í øllum sethúsa- og íbúðaspurninginum, er at fáa hendur á einum grundstykki. Er hetta fingið til vega, eru møguleikarnir fyri figging ikki heilt út av lagi, og tí metir javnaðarflokkurin at tað er neyðugt at gera ávísar broytingar í løgtingslóg nr. 85 frá 24. oktober 1978 um rentustudning til samansparing í húsabygging.

Høvuðsbroytingin í uppskotinum er, at samanspardi peningurin ikki einans kann verða nýttur til sethúsa- ella íbúðabygging, men at hann eisini kann verða nýttur til keyp av grundstykki og til keyp av sethúsum ella íbúð.

Skotið verður eisini upp at hækka rentustudningin úr 1 1/2% p.a. upp í 2% p.a. Síðani verður mælt til, at hægsta árliga innskotið, ið kemur undir rentustudning, verður hækkað úr 10.000 kr. upp í 20.000 kr. og at øll samansparingin, sum kemur undir reglurnar um rentustudning, verður hækkað úr 50.000 kr. upp í 100.000 kr.

Fløskuhálsurin í øllum sethúsa- og íbúðaspurninginum er sum nevnt tað at fáa hendur á einum grundstykki. Javnaðarflokkurin metir, at hetta uppskotið, saman við uppskoti floksins í løgtingsmáli nr 97/1981: Løgtingslóg um veitan av láni og

studningi til kommunur til keyp og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging, er ein munagóð hjálp í sethúsa- og íbúðaspurninginum.

1. viðgerð 9. februar. Málið varð beint í liggjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av javnaðarflokkinum tann 4. februar 1982 og undir 1. viðgerð tann 9. í s.m. beint í liggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd liggjarnevnd undir við uppskotinum frá javnaðarflokkinum.

Eftir uppskotinum skal lógin koma í gildi 1. apríl 1982, og verður ti sett fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

TIL § 2:

»1. apríl« verður broytt til »1. maí«. »1. april« ændres til »1. maj«.

2. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskot frá nevndini til § 2 samtykt við 29-0. Uppskotið frá Javnaðarflokkinum § 1 samtykt við 29-0, pkt. 2-5 samtykt við 29-5, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. apríl. Uppskotið samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1426-12. Lóg nr. 80 frá 21. mai 1982.

---

97. Veitan av láni og studningi til útvegan og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging.

Ár 1982, hósdagin 4. februar legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veitan av láni og stuðningi til útvegan og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging.

§ *1.* Stovnaður verður grunnur við tí endamáli at veita kommunum lán og studning til útvegan og byggibúgving av jørð til sethúsa- og íbúðabygging. Navn grunnsins er Byggibúgvingargrunnur landsins.

§ *2.* Tann peningur, ið samkvæmt løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974 er settur í kommunala lánsgrunnin, verður, tá henda lóg kemur í gildi, fluttur yvir í byggibúgvingargrunn landsins.

§ *3.* Umframt hetta letur landskassin byggibúgvingargrunni landsins eitt stovnsfæ upp á 30 mió. kr., og verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til endamálið.

§ *4.* Frá fíggjarárinum 1982/83 og hvørt fylgjandi fíggjarár verður rentuskatturin undir § 1 á løgtingsfíggjarlógini tilskrivaður Byggibúgvingargrunni landsins.

§ *5.* Grunnurin verður umsitin av umsitingini hjá húsalánsgrunninum og stjórnaður av einum stýri við fimm limum, harav Føroya Landsstýri velur ein, meðan Føroya Løgting og føroysku kommunurnar velja hvør sinar tveir limir. Í samráð við løgtingsins

lagtingslov om ydelse af lån og tilskud til tilvejebringelse og byggemodning af jord til byggegrunde til beboelseshuse og lejligheder.

§ *1.* Der oprettes et fond med det formål at yde kommuner lån og tilskud til tilvejebringelse og byggemodning af jord til byggegrunde til beboelseshuse og lejligheder. Fondets navn er »Byggibúgvingargrunnur landsins«.

§ 2. De penge, der i henhold til lagtingslov nr. 38 af 26. april 1974 er sat i den kommunale lånefond skal, når denne lov træder i kraft, overføres til »Byggibúgvingargrunn landsins«.

§ *3.* Desforuden yder landskassen »Byggibúgvingargrunni landsins« fondskapital på 30 mio. kr. og har landsstyret hjemmel landskassens vegne at optage nødvendige lån til formålet.

§ *4.* Fra finansåret 1982/83 og hvert af de følgende finansår tilskrives renteskatten under § 1 på lagtingsfinansloven »Byggibúgvingargrunnur landsins«.

§ *5.* Fondet administreres af huslånefondets administration og styres af en bestyrelse på fem medlemmer, hvoraf Færøernes landsstyre vælger en, medens Færøernes lagting og de færøske kommuner vælger hver sine to medlemmer. I samråd med

fíggjarnevnd og stýrið fyri grunnin ásetir landsstýrið nærri reglur viðvikjandi virki grunnsins.

§ 6. Treytin fyri at fáa lán og studning úr Byggibúgvingargrunni landsins er:

a) at avvarðandi kommuna hevur góðkenda byggisamtykt,
b) at søkt verður til ávísa útstykkingarætlan,
c) at kostnaðurin fyri jørð og byggibúgving ikki er órimuliga høgur,
d) at útsøluprísurin lækkar í mun til studningin, so at hesin kemur teimum til góðar, ið skulu keypa grundstykki, sethús ella íbúð burtur av viðkomandi útstykking.
e) at avvarðandi kommuna eisini letur ein studning til grundstykkjaprísin, sum í minsta lagi svarar til 10% av samlaða útveganar- og byggibúgvingarkostnaðinum.
f) at grannskoðaður roknskapur fyri hvørja útstykkingarætlan sær verður sendur grunninum til góðkenningar.

§ 7. Studningurin úr grunninum kann í mesta lagi verða 20% og lánið í mesta lagi 60% av samlaða kostnaðinum fyri eina útstykkingarætlan. Lánini verða rentað við tí til eina og hvørja tíð galdandi rentu hjá húsalánsgrunninum. Renta av lánum fellur til gjaldingar tvær ferðir um árið. Lán verða afturgoldin, so hvørt sum grundstykkini verða seld. Triðingurin av lánsupphæddini skal tó rindast aftur í seinasta lagi trý ár, eftir at lánð er útgoldið lántakaranum. Alt lánið skal

lagtingets finansudvalg og fondets bestyrelse fastsætter landsstyret nærmere regler angående fondets virksomhed.

§ 6. Betingelsen for at få lån og tilskud fra »Byggibúgvingargrunni landsins« er:

a) at vedkommende kommune har godkendt byggevedtægt.
b) at ansøgningen gælder en bestemt udstykningsplan
c) at prisen på jord og byggemodning ikke er urimelig høj.
d) at salgsprisen falder i forhold til tilskudet, således at denne kommer dem tilgode, som skal købe byggegrund, beboelseshus eller lejlighed af vedkommende udstykning.
e) at vedkommende kommune også yder tilskud til prisen på byggegrunden, som mindst svarer til 10% af den samlede tilvejebringelses- og byggemodningspris.
f) at revideret regnskab for hver enkelt udstykningsplan sendes fondet til godkendelse.

§ 7. Tilskudet fra fondet kan højst udgøre 20% og lånet højst udgøre 60% af de samlede omkostninger for en udstykningsplan. Lånene forrentes med den til enhver tid gældende rente for huslånefonden. Renten af lånene forfalder til betaling to gange årligt. Lånene tilbagebetales efterhvert som byggegrundene bliver solgt. Trediedelen af lånesummen skal dog tilbagebetales senest tre år efter at lånet er udbetalt låntageren. Alt lånet skal være tilbagebetalt senest 15 år efter, at det er udbe-

verða afturgoldið í seinasta lagi 15 ár, eftir at tað er útgoldið lántakaranum.

talt låntageren.

§ 8. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 38 frá 26. apríl 1974 um veitan av láni til kommunur til keyp av jørð.

§ 8. Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 38 af 26. april 1974 om ydelse af lån til kommuner til opkøb af jord.

Viðmerkingar:

Hóast ymisk skilagóð tiltøk frá almennari síðu til tess at bøta um trotið á sethúsum og íbúðum, er framvegis stór húsaneyð í Føroyum, serstakliga í teimum størru býunum og bygdunum í landinum.

Nógvar orsakir eru til hesa húsaneyð, eitt nú tann ógvuliga sterka centralisering, sum er farin fram tey seinastu 25 árini, sum hevur gjørt, at kommunalir myndugleikar illa hava kunnað fylgt við í útstykkingum av byggigrundum í mun til tørvin.

Av øðrum orsøkum kann verða vist á ymisk brek við sjálvari figgingarskipanini fyri byggibúning og sethúsabygging.

Sum figgingin av sethúsum er skipað í dag, so fyritreytar hon, at tann, sum skal byggja, sjálvur eigur grundstykki, áðrenn hann fer til tann almenna og teir privatu lánstovnarnar. Hjá teimum, sum frammanundan hava ognað sær grundstykki, er vanliga ikki torført at fáa figging til sjálva byggingina. Hóast henda figging er tung hjá lántakaranum at lyfta, so er hon tó vanliga soleiðis háttað, at hann, ið byggir, fær tað mesta liðugt. Tey flestu fáa øll húsini liðug — onnur so mikið, at tey fáa verið inni, til tey sjálv hava smíðað liðugt, ella til lánmøguleikarnir batna.

Øðrvísið er við teimum mongu, sum einki grundstykki eiga, men fegin vilja byggja sær sethús ella hava eina líkinda íbúð at flyta í.

Hesi fólk hava ofta skrivað seg upp bæði hjá kommunu og hjá privatum jarðaeigarum í tí vón einaferð at verða so heppin at fáa byggigrund.

Prísurin á hesum stykkjum, kommunalum sum privatum, er støðugt hækkandi, hóast kommunurnar hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at halda prísunum niðri. Í einari kommunalari útstykking í høvuðsstaðnum liggur prísurin um 120-130 kr. fyri m^2, og sum kunnugt er hann munandi hægri í teimum privatu útstykkingunum. Hetta merkir, at eitt vanligt grundstykki nú kostar millum 140.000 og 250.000 kr.

Av hesum fylgir aftur, at bert hetta at fáa byggigrund til vega er vorðið eitt ógvuliga tungt lak hjá tí, sum ætlar sær at byggja. Mong noyðast sostatt at spara upp í áravís fyri at kunna keypa stykki. Onnur noyðast at taka stór lán til at gjalda grundstykkið við og eru sostatt longu bundin av stórari skuld, áðrenn spakin verður settur í jørðina. Uppaftur onnur hava als ongan møguleika at ogna sær grundstykki, antin tí, at tey ikki fáa lán til grundstykkjakeyp ella tí, at tey yvirhøvur ikki kunnu fáa hendur á einum stykki. Sostatt hongur húsaneyðin óloysiliga saman við

spurninginum um útstykkingar og úthoð av grundstykkjum. Tað er trotið á grundstykkjum til ein yvirkomiligan prís, sum nú tykist at vera fløskuhálsurin í allari sethúsa- og íbúðabygging í Føroyum.

Hetta álvarsama trot á biligum og byggiklárum grundstykkjum metir javnaðarflokkurin sum eitt samfelagsmál, ið bert kann verða loyst sum eina samfelagsuppgávu. Tiskil mælir javnaðarflokkurin við fyriliggjandi uppskoti til, at tað almenna t.v.s. land og kommunur í nógv størri mun enn higartil átaka sær uppgávuna at fáa til vega nóg mikið av biligum, byggiklárum grundstykkjum um alt landið.

Tað er javnaðarfloksins meting, at kommunali lánsgrunnurin, stovnsettur við lóg nr. 38 frá 26. apríl 1974, ikki røkkur til at greiða tørvin á grundstykkjum, og tí mælir flokkurin til at seta á stovn ein nýggjan grunn við meira viltfevnandi virkisøki og munandi størri fíggjarorku. Í hesum sambandi verður í § 8 skotið upp at avlaka kommunala lánsgrunnin, og í § 2 verður skotið upp at flyta tann pening, sum er í hesum lánsgruni yvir í nýstovnaða byggibúgvingargrunn landsins. Eisini verður skotið upp, at landskassin letur byggibúgvingargrunninum eitt stovnsfæ upp á 30 mill. kr., og somuleiðis at inntøkan av rentuskattinum upp á ca. 7 mió. kr. um árið í framtíðini verður tilskrivað hesum grunni. Á henda hátt fáa kommunurnar sín part av einum skatti, ið annars allur er farin í landskassan.

Sum tað framgongur av lógaruppskotinum, so er ætlanin, at byggibúgvingargrunnurin skal hava stýri leyst av húsalánsgrunninum, meðan umsitingin verður felags. Hetta er fyri at sleppa undan dupultari umsiting, meðan ein varðveitir eina decentrala ávirkan á grunsins stýri í gjøgnum umboð kommununar.

Mælt verður í lógaruppskotinum til, at lánini verða afturgoldin so hvørt grundstykkini verða seld. Tó verður skotið upp, at 1/3 av lántøkuni verður at gjalda aftur í seinasta lagi 3 ár eftir, at lánið er veitt avvarðandi kommunu, meðan alt lánið eigur at verða goldið aftur í seinasta lagið 15 ár eftir lántøku.

Javnaðarflokkurin metir eisini, at uppsparing hevur stóran týdning í samband við útvegan av grundstykki og leggur tí fram uppskot um broytingar í løgtingslóg nr. 85 frá 24. oktober 1978 — broytingar, sum flokkurin metir bera á tað rætta borðið, og vist verður her til løgtingsmál nr. 96/1981: Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging.

Samanumtikið kann sigast, at høvuðsendamálið við lógaruppskoti javnaðarfloksins um ein byggibúgvingargrunn er at eggja kommunum til at fara undir munandi fleiri útstykkingar, enn talan er um í løtuni. Við hesum uppskoti kunnu grundstykkini, um rætt verður atborið, bæði gerast nógv fleiri og upp á seg væl biligari enn nú. Hetta skuldi sostatt gjørt tað munandi lættari at fingið byggigrundir til sethús hjá tí einstaka, men tað skuldi eisini lætt um og styrkt hugin hjá kommunum, sosialum felagsskapum og stýrinum fyri íbúðagrunnin at sett í verk bygging av íbúðum, solciðis at eisini hesin serligi tørvur á bústaði verður nøktaður. Tað er veruleiki, at ikki øll ynskja at eiga síni egnu sethús eins og heldur ikki øll kunnu eiga síni

egnu sethús. Hesi hava eisini sín rætt — ein rætt, sum tað í dag tykist ógvuliga tungr at fáa framdan.

Uppskotsstillarin, Føroya Javnaðarflokkur, er greiðir yvir, at ein ávísur vandi fyri spekulatión er í øllum hesum, og er § 6 í lógaruppskotinum ætlað at skula forða fyri slíkari spekulatión og øðrum møguligum misbróki. Møguliga kundu heilt aðrir út vegir verið funnir til tess at byrgja fyri spekulatión og í heila tikið fyri mongum av teimum ódámligu fyribrygdum, sum ofta hanga uppi í øllum jarðarspurninginum, og sum ofta fylgja við til stóra trotinum á byggilendi.

1. viðgerð 9. februar. Málið varð beint í sosialu nevndina.

Eftir ynski frá Javnaðarflokkinum varð málið 10. februar beint úr sosialu nevndini í liggjarnevndina.

Málið ikki alfturkomið.

98. Vektgjald av motorakførum v.m.

Ár 1982, friggjadagin 5. februar legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.

§ *1.* Eftir reglunum í hesi lóg skal gjald latast til landskassan av skrásetingarskyldugum motorakførum heimahoyrandi her á landi og av síðu- og viðfestum vognum til hesi.

§ *2.* Vektgjald verður at rinda av øllum gjaldskyldugum akførum, og av gjaldskyldugum akførum, ið eru lagað til at nýta aðra drívmegi enn bensin, verður harumframt rindað eitt útjavningargjald.
2. stk. Traktorar rinda ikki útjavningargjald.

§ *3.* Árligt gjald verður at rinda eftir hesi gjaldskrá:

lagtingslov om vægtafgift af motorkøretøjer m.v.

§ *1.* Efter reglerne i denne lov svares der afgift til landskassen af de her i landet hjemmehørende indregistreringspligtige motorkøretøjer samt af side- og påhængsvogne til sådanne.

§ *2.* Af samtlige afgiftspligtige køretøjer svares vægtafgift, og af afgiftspligtige køretøjer, som er indrettet til at benytte anden drivkraft end benzin, svares tillige en udligningsafgift.

Stk. 2. Traktorer er fritaget for udligningsafgift.

§ *3.* Der svares afgift efter følgende helårlige satser:

	Vektgjald Vægtafgift kr.	Útjavningargjald Udligningsafgift kr.	Viðfestur vognur Påhængsvogn kr.
A. Persónvognar, tó ikki bussar og hýruvognar Personbiler, bortset fra busser og hyrevogne			
upp til 600 kg. eginvekt indtil egenvægt		488	
601 - 800 kg —		652	260
801 - 1100 kg		812	324
1101 - 1300 kg —		1040	436

	Vektgjald Vægtafgift	Útjavningargjald Udligningsafgift	Viðfestur vagnur Påhængsvogn
	kr.	kr.	kr.
1301 - 1500 kg totalvægt	1364	588	
1501 - 2000 kg —	1884	760	
over 2000 kg —	2080	1052	
B. Hýruvognar Hyrevogne			
upp til 800 kg eginvekt	392	1560	
indtil egenvægt			
801 - 1100 kg —	520	1952	
1101 - 1300 kg —	676	2340	
1301 - 1500 kg —	884	2536	
yvir 1500 kg —	1196	2732	
over			
C. Motorsúklur Motorcykler	324	88	
D. Bussar Busser			
upp til 2000 kg eginvekt	548	976	
indtil egenvægt			
2001 - 4000 kg —	648	1756	
yvir 4000 kg —	1040	2536	
over			
E. Vøru- og lastvognar, traktorar o.l. Vare- og lastvogne, traktorer o.l.			
501 - 1500 kg totalvekt	392	1560	40
totalvægt			
1501 - 2000 kg —	444	1560	80
2001 - 2500 kg —	496	1660	104
2501 - 3000 kg —	544	1756	156
3001 - 3500 kg —	600	1952	236
3501 - 6000 kg —	652	2340	312
6001 - 8000 kg —	912	2732	468
8001 - 9000 kg —	1040	3120	624

	Vektgjald Vægtafgift	Útjavningargjald Udligningsafgift	Viðfestur vognur Påhængsvogn
	kr.	kr.	kr.
9001 - 10000 kg totalvægt	1172	3512	700
10001 - 11000 kg —	1300	3900	1040
11001 - 12000 kg -	1432	4292	1144
yvir 12000 kg — over	1560	4680	1248

§ *4.* Gjaldskeiðið er fyri akførini í § 3 A og C og fyri akførini í § 3 E við totalvekt til og við 3.500 kg 12 mánaðir frá 1. apríl til 31. mars. Fyri hini akførini í § 3 er gjaldskeiðið 6 mánaðir frá 1. apríl til 30. september og frá 1. oktober til 31. mars.

2. stk. Vektgjald og útjavningargjald falla til gjaldingar, tá gjaldskeiðið byrjar, og verða rindað frammanundan, fyri alt skeiðið. Um skrásett verður í mars ella september mánaðum, fellur gjaldið fyri tað komandi gjaldskeiðið til gjaldingar.

3 stk. Um gjaldskyldug akfør verða fráme1dað akfarsskrásetingini, verður gjaldskeiðið stytt við teimum fullu mánaðunum av avlopstíðini. Verður eitt fráme1dað akfar skrásett av nýggjum, tekur gjaldskyldan við eftir teimum í 1. stk. fastsettu reglum, tó ikki fyrrenn tann 1. í tí fylgjandi mánaðinum aftan á fráme1dingina.

4 stk. Tann í 3 stk. umrødda fráme1ding skal vera politivaldinum í hendi í seinasta lagi tann síðsta yrkadagin í mánaðinum.

5. stk. Afturrindan av gjaldi vegna styttan av gjaldsskeiðinum, sum nevnt í 3: stk. fer fram á gjaldstovuni í Tórshavn til hann, sum um tað mundið er skrásettur fyri akfarinum. Afturrindað

§ *4.* Afgitsperioden er for de i § 3 A og C nævnte køretøjer med totalvægt til og med 3.500 kg 12 måneder fra den 1. april til den 31. marts. For de øvrige i § 3 nævnte køretøjer er afgiftsperioden 6 måneder fra den 1. april til den 30. september og fra den 1. oktober til den 31. marts.

Stk. 2. Vægtafgift og udligningsafgift forfalder til betaling ved afgiftsperiodens begyndelse og betales forud for hele perioden. Ved registrering i marts eller september måneder forfalder afgiften for den kommende afgiftsperiode til betaling.

Stk. 3. Såfremt et afgiftspligtigt køretøj afmeldes af motorregistret, afkortes afgiftsperioden med de resterende hele måneder af perioden. Registreres et afmeldt køretøj på ny, indtræder afgiftspligten efter de i stk. 1 fastsatte regler, dog tidligst fra den 1. i den måned, der følger efter afmeldingen.

Stk. 4. Den i stk. 3 omhandlede afmelding skal være politiet i hænde senest den sidste hverdag i måneden.

Stk. 5. Tilbagebetaling af afgift som følge af afgiftsperiodens afkortning som nævnt i stk. 3 sker fra Gjaldstovan i Tórshavn til den, i hvis navn køretøjet på tidspunktet for afmeldingen er registreret. Tilbagebe-

verður uttan umsókn frammanundan.

§ 5. Tá akfar skal skrásetast, skal hann, ið biður um tað, siga frá, um akfarið er lagað at nýta bensin sum drivmegi, ella aðra drivmegi.
2. stk. Tann gjaldskyldugi skal beinanvegin boða politivaldinum frá um eina og hvørja broyting, ið er av týdningi fyri útrokningina av gjaldinum.
3. stk. Gjaldstovan fyriskrivar gjøllari reglur fyri umrokning av gjaldinum vegna fráboðaðar broytingar og avger, nær broyttu gjøldini skulu byrja.

§ 6. Gjaldið skyldar hann, í hvørs navni akfarið er skrásett, tá gjaldið fellur til gjaldingar. Um akfarið er skrásett fyri einum brúkara, eins væl og einum eigara, koma báðir undir gjaldið.
2. stk. Hevur akfarið, tá gjaldið fellur til gjaldingar, skift eigara (brúkara), uttan at skrásetingin hevur fingið boð um hetta, kemur tann nýggi eigarin (brúkarin) eisini undir gjaldið.
3. stk. Um avgjaldsseljari hevur tikið akfarið aftur, kemur eisini hann undir gjaldið fyri tað gjaldsskeiðið, í hvørjum afturtøkan er hend.
4. stk. Verður skjalprógvað, at akfarið í seinasta lagi tann 15. í mánaðinum, áðrenn gjaldið fellur til gjaldingar, hevur skift eigara (brúkara), kemur bert tann nýggi eigarin (brúkarin) undir gjaldið, sjálvt um eigara- (brúkara-) skiftið ikki er fráboðað akfarsskrivstovuni (fútaskrivstovuni) í Tórshavn.

taling sker uden forudgående ansøgning.

§ 5. Når et køretøj søges registreret, skal anmelderen angive, om køretøjet er indrettet til at benytte benzin som drivkraft eller anden drivkraft.
Stk. 2. Om enhver ændring, der er af betydning for afgiftens beregning, skal den afgiftspligtige straks afgive meddelelse til politiet.
Stk. 3. Gjaldstovan fastsætter de nærmere regler for afgiftens omberegning som følge af anmeldte ændringer og træffer herunder bestemmelse om tidspunkt for overgang til de ændrede afgiftsbeløb.

§ 6. Afgiften påhviler den, i hvis navn køretøjet på afgiftens forfaldstid er registreret. Såfremt køretøjet er registreret for såvel en bruger som en ejer, påhviler afgiften dem begge.
Stk. 2. Er køretøjet på afgiftens forfaldstid overgået til anden ejer (bruger), uden at dette er anmeldt motorkontoret i Tórshavn, påhviler afgiften tillige den nye ejer (bruger).
Stk. 3. Ved afbetalingssælgers tilbagetagelse af køretøjet påhviler afgiften for den afgiftsperiode, i hvilken tilbagetagelsen har fundet sted, tillige afbetalingssælgeren.
Stk. 4. Såfremt det dokumenteres, at køretøjet senest den 15. i måneden før afgiftens forfaldstid er overgået til en anden ejer (bruger), påhviler afgiften alene den nye ejer (bruger), selv om ejer- (bruger-) skiftet ikke er anmeldt til motorkontoret (politikontoret) i Tórshavn.

5. stk. Hevur fráboðan um skráseting viðført órættvísa skráseting av einum akfari í navninum hjá einum øðrum enn hjá fráboðaranum, kemur fráboðarin undir gjaldið.
6. stk. Er eitt akfar, ímóti reglunum í ferðslulógini, ikki skrásett, áliggur gjaldið honum, ið hevur skyldu at skráseta akfarið.

Stk. 5. Har anmeldelse til registrering medført uberettiget registrering af et køretøj i en andens navn end anmelderens, påhviler afgiften anmelderen.
Stk. 6. Såfremt et køretøj i strid med færdselslovens bestemmelser ikke er registreret, påhviler afgiften den, der er pligtig at lade det registrere.

§ *7.* Fyri rindað gjald verður givin ein kvittan, ið skal fylgja við akfarinum við eigaraskifti.

§ *7.* For betalt afgift udstedes en kvittering, der skal medfølge køretøjet ved ejerskifte.

§ *8.* Verður gjaldið ikki rindað rættstundis, skal politivaldið síggja til, at nummarspjøldrini verða tikin av beinanvegin. Hann, ið fult ella lutvíst ábyrgist gjaldinum, kann hereftir ikki fáa akfarið skrásett, fyrr enn tað gjald, ið liggur á honum, er rindað.
2. stk. Verður gjaldið ikki rindað rættstundis, kemur 1% í rentu um mánaðin uppá fyri hvønn ásettan mánað frá gjaldkomudegnum at rokna, til rindað verður, tó í minsta lagi 25 kr.
3. stk. Gjaldkomnar rentur sambært 2. stk. verða ikki endurrindaðar, tá gjald verður afturrindað sambært § 4, 3. stk.

§ *8.* Hvis afgiften ikke erlægges rettidigt, skal køretøjets nummerplader snarest fjernes ved politiets foranstaltning. Den, der helt eller delvis hæfter for afgiften, kan herefter ikke få køretøjet registreret, før den afgift, der påhviler ham, er betalt.
Stk. 2. Hvis afgiften ikke erlægges rettidigt, tillægges 1% månedlig rente for hver påbegyndt måned fra forfaldsdagen at regne, indtil betaling sker, dog mindst 25 kr.

Stk. 3. Forfaldne renter i henhold til stk. 2 refunderes ikke ved tilbagebetaling af afgift i medfør af § 4, stk. 3.

§ *9.* Gjaldið við rentu og kostnaði kann innheintast við útpanting.

§ *9.* Afgiften med påløbne renter og omkostninger kan inddrives ved udpantning.

§ *10.* Landsstýrið kann áseta reglur um, at akfør skulu hava eitt merki ella tílíkt, sum prógv fyri, at gjaldið er goldið, og politivaldið kann taka nummarspjøldrini av, um so er, at akfarið

§ *10.* Landsstyret kan fastsætte regler om, at køretøjet skal være forsynet med en mærkat eller lignende til dokumentation for, at afgiften er betalt, og at køretøjets nummerplader kan fjer-

ikki hevur hetta prógvmerkið. Landsstýrið ásetir reglur um, hvussu merkini skulu siggja út, útflýggjan, hvar tey skulu setast og nýtslu.

§ *11.* Undantikin vektgjaldi og útjavningargjaldi eru:
1) Akfør hjá sløkkiliði og politivaldi.
2) Akfør, ið einans verða nýtt til sjúkraflutning.
3) Landbúnaðartraktorar, sjálvt um hesir verða nýttir út um avmarkingarnar í ferðslulógini § 12, men tó ikki út um flutning av egnari framleiðslu innan kommununark, har ognin er.

§ *12.* Landsstýrið kann sleppa avlamisfólki, ið sambært lógina um avlamispensjón, kunnu fáa stuðul til keyp av akfari, undan vektgjaldi. Loyvið at sleppa undan vektgjaldi, er bert galdandi, so leingi hin avlamni er skrásettur fyri akfarinum og nýtir tað.

§ *13.* Við bót verður hann staffaður, ið gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ið nýtast skulu
1) tá avgerast skal, um gjald skal rindast av akfari,
2) tá gjaldupphæddin verður útroknað,
3) tá avgerast skal um undantøku fyri gjaldi, ella endurrindan av gjaldi.

2. stk. Á sama hátt verður hann straffaður, ið:
1) sleppur sær undan gjaldi við at nýta skrásetingarskyldugt akfar, ið ikki er skrásett,
2) ikki sambært § 5, 2. stk. gevur politines af politiet, såfremt køretøjet ikke er forsynet med denne dokumentation. Landsstyret fastsætter bestemmelser om mærkaternes udseende, udlevering og benyttelse.

§ *11.* Fritaget for vægtafgift og udligningsafgift er:
1) Køretøjer, der er indregistreret som tilhørende brandvæsenet og politiet.
2) Køretøjer, der udelukkende er indrettet til sygetransport.
3) Landbrugstraktorer, selv om de anvendes udover afgrænsning i færdselslovens § 12, men dog ikke udover at transportere egne produkter indenfor den kommunes grænse, hvor ejendommen er beliggende.

§ *12.* Landsstyret kan fritage invaliderende personer, som efter invalidepensionsloven kan opnå støtte til erhvervelse af et motorkøretøj, for vægtafgift. Afgiftsfritagelsen gælder kun, så længe køretøjet er registreret for og benyttes af den pågældende.

§ *13.* Med bøde straffes den, der afgiver urigtige eller vildledende oplysninger til brug ved
1) afgørelse af, om der skal svares afgift af et køretøj,
2) beregning af afgiftens størrelse,
3) afgørelse om afgiftsfritagelse eller tilbagebetaling af afgift.

Stk. 2. På denne samme måde straffes den, der
1) unddrager sig afgift ved at benytte et registreringspligtigt køretøj, der ikke er registreret,
2) undlader i overensstemmelse med § 5, stk. 2, at give politiet oplysning

tivaldinum fráboðan um broytingar við akfarinum, sum eru av týdningi fyri gjaldútrokningina,

3) nýtir ella innrættar eitt akfar, ið er undantikið gjaldi, móti treytunum fyri undantøku fyri gjaldi.

3. stk. Í fyriskipanum, ið givnar verða sambært lógina, kann ásetast bót, sum straffur fyri brot á reglur í fyriskipanini.

§ *14.* Lógin kemur í gildi 1. aprfl 1982.

2. stk. Samstundis fara fylgjandi reglur úr gildi:

1. §§ 66, 67, 68, 69 og 70 í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu við seinri broytingum.
2. Løgtingslóg nr. 23 frá 9. mai 1968 um gjøld av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 70 frá 24. august 1979.

om ændringer ved et køretøj, som er af betydning for afgiftens beregning,

3) benytter eller indretter et køretøj, som er fritaget for afgift, i strid med betingelserne for afgiftsfritagelsen.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

§ *14.* Loven træder i kraft den 1. april 1982.

Stk. 2. Samtidig bortfalder følgende bestemmelser:

1. §§ 66, 67, 68, 69 og 70 i lagtingslov nr. 65 af 9. september 1963 om færdsel med senere ændringer,
2. Lagtingslov nr. 23 af 9. maj om afgift på motorkøretøjer, som ændrer ved lagtingslov nr. 32 af 14. april 1977 og lagtingslov nr. 70 af 24. august 1979.

Viðmerkingar:

1. Reglurnar um vektgjald av motorakførum v.m. eru í dag at finna
   í
   a) ferðslulógni §§ 66-70, løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 við seinni broytingum
   b) løgtingslóg nr. 23 frá 9. mai 1968, sum broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 14. apríl 1977 og løgtingslóg nr. 70 frá 24. august 1979.

   Tá reglur um vektgjald v.m. bert eru eitt gjaldmál, verður skotið upp, at reglurnar í ferðslulógini hesum viðvikjandi verða sagdar úr gildi, og at reglurnar um vektgjald verða samlaðar í einari løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.

2. Sambært galdandi reglur er gjaldskeiðið ein ársfjórðingur. Gjaldið verður rindað frammanundan fyri hvønn ársfjórðing. Um gjaldið ikki verður rindað rættstundis, skal politivaldið síggja til, at nummarspjøldrini verða tikin av beinan vegin.

   Uppkrevjingarhátturin er annars fylgjandi:

   a) Tann 10. í mánaðinum frammanundan ársfjórðingsbyrjan, sendir Føroya

Gjaldstova út postávísingar til allar eigarar av motorakførum, sum um tað mundið eru skrásett, við áheitan um at gjalda inn ta á postávísingini tilskilaðu upphædd, seinast tann 1. í byrjanini av ársfjórðinginum, um eigari ikki innan síðst nevndu tíð, letur frá sær nummarspjøldrini.

b) Í fyrsta mánaðinum av hvørjum ársfjórðingi sendir Føroya gjaldstova út eitt áminningarskriv, ið minnir eigaran á at rinda gjaldið.

c) Í fyrsta mánaði av hvørjum ársfjórðingi gevur Føroya Gjaldstova fútaskrivstovuni ein eftirstøðulista við teimum akførum, sum gjald ikki er rindað fyri, ella nummarspjøldrini ikki latin inn, sum fyrisett.

d) Eftirstøðulistarnir verða sendir til sýslurnar (politistøðirnar), ið beinan vegin skulu taka nummarspjøldrini av teimum akførum, sum kvittan fyri rindað gjald, ikki kann vísast fyri á staðnum.

Henda uppkrevjingarskipan er tíðarkrevjandi fyri gjaldstovuna og politivaldið.

Í 1979 og 1980 fekk fútaskrivstovan ávikavist 3.904 og 4.026 áheitanir frá gjaldstovuni um eftirstøðu viðvíkjandi vektgjaldi.

Uppskotið ber í sær ein einfaldan uppkrevjingarhátt, tá skotið verður upp, at gjaldskeiðið, sum nú er ein ársfjórðingur, verður í flestu førum sett til 1 ár. Gjaldskeiðið kann styttast við fyrstu inngjalding, tá nýtt akfar verður skrásett, og við frámelding í einum gjaldskeiði. Eigaraskifti verður ikki roknað sum frámelding, men tann nýggi eigarin beldur áfram við gjaldinum hjá seljaranum.

Nýskipanin, ið skotin er upp, fer at gera arbeiðið hjá gjaldstovuni og politivaldinum nógv einfaldari, viðvíkjandi innheinting av vektgjaldinum, og hon er rímilig, tá hugsað verður um at ársgjøldini vanliga eru smá. Tá hugsað verður um at nógvir bileigarar figgja bilkeyp teirra við dýrum avgjaldssáttmálum, sýnist tað órímiligt, at tað lítla árliga vektgjaldið hjá landinum, skal uppkrevjast 4 ferðir um árið og við stórum og kostnaðarmiklum innheintingartrupulleikum hjá gjaldstovuni og politivaldinum.

Til sammetingar kann verða nevnt, at fyri ein fólkamotorvogn við eginvekt uppá 801-1100 kg verður rindað eitt vektgjald uppá 812 kr. árliga, og fyri ein fólkamotorvogn uppá 1101-1300 kg 1.040 kr. árliga. Í Danmark, har gjaldskeiðið fyri akfør av hesum slagi er 6 mánaðir, verða goldnar ávikavist 729 kr. og 972 kr. 2 ferðir um árið.

Hugsast kann, at ímóti nýskipanini verður framført, at ársuppkrevjingin er órímilig móti eigarum av vinnuakførum, serstakliga størri lastbilum, ið eisini rinda útjavningargjald. Hóast tað at vektgjaldið bert er ein minni rakstrarkostnaður fyri hesi akfør, verður skotið upp, at gjaldskeiðið fyri vinnuakfør burtur av í staðin fyri 1 ár verður sett til 1/2 ár. Hesi akfør eru umleið 7% av øllum akførum. Vanliga er tað eingin spurningur at krevja avgjaldið fyri hesi akfør. Eisini í hesum førum har gjaldskeiðið er 1/2 ár, er tað so at gjaldskeiðið kann styttast við fyrstu gjalding við skráseting av nýggjum akfari, og við striking í gjaldskeiði, og at eigaraskifti ikki er frámelding.

Vektgjald og útjavningargjald eru tilsamans við galdandi taksturn um 12 mió. kr. um árið.

Viðmerkingar til tær einstøku reglurnar:

Til §§

1 og 2: Reglurnar áseta, hvørji akfør, gjald skal rindast fyri og samsvarar teimum núverandi reglunum í ferðslulógini § 66, stk. 1, 1. pkt.

Til § 3: Reglan vísir gjaldupphæddina fyri tey ymisku sløgini av akførum, sbr. løgtingslóg nr. 70 frá 24. august 1979.

Til § 4: Reglan ásetir gjaldskeiðið til 1 ár frá 1. apríl til 31. mars fyri persónvognar (tó ikki bussar og hýruvognar) og motorsyklur og eisini vøru- og lastvognar, traktorar o.l. til og við totalvekt 3.500 kg. Fyri hýruvognar, fyri bussar og fyri vøru- og lastvognar, traktorar o.l. við totalvekt yvir 3.500 kg er gjaldskeiðið 1/2 ár frá 1. apríl til 30. september og frá 1. oktober til 31. mars. Eisini eru reglur um, nær gjaldskeið byrja við tilmelding til skráseting í einum gjaldskeiði. Gjaldið fellur til gjaldingar, tá gjaldskeiðið byrjar. Gjaldið fyri akfør, ið eru skrásett 1. apríl fellur til gjaldingar, tá gjaldskeiðið byrjar.

Gjaldið fyri akfør, ið eru skrásett 1. apríl fellur til gjaldingar tann 1. apríl.

Eisini verður ásett, at verður eitt akfar frámeldað í einum gjaldskeiði, verður vektgjaldið fyri restina av gjaldskeiðinum endurgoldið eftir gjøllari reglum. Tá uppkrevjingin av vektgjaldinum hendir um eina edv-skipan, fara endurgjaldsreglurnar ikki at geva umsitingarligar trupulleikar.

Til § 5: Reglan áleggur honum, ið søkir um at fáa eitt akfar skrásett, skyldu til at geva upplýsingar, ið eru av týdningi fyri avgerðina um, umframt vektgjaldið, eisini útjavningargjald skal rindast, og skyldu til at siga politivaldinum frá eini og hvørjari broyting, ið hevur týdning fyri útrokningina av gjaldinum. Hetta samsvarar reglunum í ferðslulógini § 69.

Til § 6: Reglan hevur nágreiniligar reglur um, hvør kemur undir gjaldið, og samsvarar stórt sæð reglunum í ferðslulógini § 66, stk. 2, og ti starvshátti, ið fylgdur verður í dag.

Til § 7: Reglan ásetir, at fyri rindað gjald verður givin ein kvittan, ið skal fylgja akfarinum við eigaraskifti, sbr. ferðslulógina § 68, stk. 4. Eigaraskifti verður ikki roknað sum frámelding. Tann nýggi eigarin heldur áfram í gjaldskeiðnum við gjaldinum, sum fyrrverandi eigarin hevur rindað.

Til § 8: Reglurnar áseta fylgjurnar av, at gjaldið ikki verður rindað rættstundis, og samsvarar reglunum í ferðslulógini § 66, stk. 4, og § 69, stk. 2, og í ti starvshátti, ið fylgdur verður í dag.

Til § 9: Reglan ásetir, at gjaldið við afturatkomnum rentum og kostnaðum kann verða heintað inn við panting.

Til § 10: Reglan er nýggj. Skotið verður upp, at landsstýrið verður heimilað at áseta

reglur um, at akfarið skal hava eitt merki ella liknandi, sum prógvar, at gjaldið er rindað, og at politivaldið kann taka nummarspjøldrini av, um akfarið ikki hevur hetta prógv.

Merkið kundi verið útflýggjað í samband við rindan fyri eitt gjaldskeið, og møguliga kann verða avgjørt, at tað kann verða heft á nummarspjøldrini millum »F« og tølini ella á forrútin.

Reglur um hetta fara at lætta um innkrevjingina og í sær sjálvum vera ein áeggjan at syrgja fyri, ikki at koma í eftirstøðu.

Samsvarandi reglur finnast í fleiri londum, t.d. Svøriki og Týskalandi.

Til § 11: Reglan ásetir, hvørji akfør eru undantikin gjaldi, og samsvarar reglunum í ferðslulógini § 66, stk. 1.

Til § 12: Reglan er nýggj og gevur landsstýrinum heimild til at undantaka avlamisfólk fyri vektgjaldi, í tann mun tey eftir avlamispensiónslógini kunnu fáa stuðul til keyp av motorakfari.

Til § 13: Reglan gevur heimild til bótastraff fyri brot á lógina og tær sambært lógina ásettu fyriskipanir.

1. viðgerð 10. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 16. februar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 5. februar 1982 og undir 1. viðgerð 10. februar beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur á fundi tann 12. februar 1982 viðgjørt málið og mælir meirilutin (Ivan Johannesen, Adolf V. Hansen, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Asbjørn Joensen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Atli Dam) førir fram:

Hóast minnilutin tekur undir við, at ávís tiltøk verða framd, ið føra til rationalisering hjá almennu umsitingini, kann minnilutin ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins í hesum máli. Minnilutin leggur stóran dent á, at fastar árligar útreiðslur hjá fólki, í størst møguligan mun verða lutaðar sundur í smærri gjøld, t.d. í mánaðarlig gjøld ella gjøld, ið falla til gjaldingar eina ferð um fjórðingsárið. Fyrr í tíðini varð løgtingsskatturin kravdur inn í tveimum árligum gjøldum, men fyri fleiri árum síðani varð hetta broytt, soleiðis at allur skattur nú verður kravdur inn við 10 árligum gjøldum. Sami innkrevjingarháttur verður nýttur t.d. av SEV og telefonverkinum, og nú eru oljufeløgini eisini í ferð við at leggja um til sama innkrevjingarhátt. Uppskot landsstýrisins er ikki í tráð við hendan uppkrevjingarháttin, men hevur tvørtur ímóti til endamáls, at vektgjaldið av motorakførum, ið nú verður kravt upp fýra ferðir um árið, í framtíðini skal krevjast upp

eina ferð um árið. Tó verður vektgjaldið fyri størri akfør til vinnulig endamál kravt inn tvær ferðir um árið. Vísandi til frammanfyri standandi kann minnilutin ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og setir so statt einki uppskot fram.

2. viðgerð 24. februar. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 17-0, §§ 2-14 samtykt við 17-0. Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð varð samtykt við navnakalli við 17 ja-atkvøðum, 9 atkvøddu ikki, 6 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Asbjørn Joensen, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Jacob Lamhauge, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Pauli Ellefsen, Jógvan Sundstein.

Atkvøddu ikki: Vilhelm Johannesen, Tórálvur M. Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Atli Dam, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Burturstaddir: Jóannes Dalsgaard, Jacob Lindenskov, Erlendur Patursson, Óli Breckmann, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði.

3. viðgerð 26. februar. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 18-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 407-2-5, Lóg nr. 38 frá 31. mars 1982.

---

99. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 5. februar varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum frá Eli Nolsøe, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Er tað rætt, at peningurin, sum varð avsettur til vegagerð til Múla á fíggjarlógini 1981/82, ikki er til taks?

2. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at fáa peningin til vega, soleiðis at arbeiðið kann byrja í hesum fíggjarári?

Viðmerkingar:

Í sundurgreiningunum til løgtingsins fíggjarlóg fyri 1981/82 er avsett 1 mió. kr. til vegagerð til Múla.

Tá farast skuldi undir arbeiðið nú um dagarnar, fáa menn at vita, at umrøddu peningaupphæddi ikki er til. Upplýst verður uppá fyrispurning til landsverksskrivstovuna, at peningurin er farin til okkurt annað.

Eg loyvi mær tí at spyrja avvarðandi landsstýrismann, hvussu tað skal skiljast, at peningurin, sum var ætlaður til nevndu vegagerð, er farin til annað endamál.

Eisini er neyðugt at fáa at vita, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at útvega peningin aftur til Múlavegin nú beinanvegin, soleiðis at vegagerðin kann byrja í hesum fíggjarárinum, sum ætlað.

16. februar svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 99/1981 hevur løgtingsmaðurin Eli Nolsøe sett mær hesar spurningar:

1. Er tað rætt, at peningurin, sum varð avsettur til vegagerð til Múla á fíggjarlógini 1981/82, ikki er til taks?
2. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at fáa peningin til vega, soleiðis at arbeiðið kann byrja í hesum fíggjarári?

Tá eg nú skuldi byrja og leita eftir hesi milliónini, sum Eli Nolsøe heldur vera burtur, rann mær í huga, at í hesum døgum, hvar í nógv verður tosað um vegagerðir bæði yvir fjøll og gjøgnum fjøll, var tað vert at givið tingmonnum eina frágreiðing ella eitt søguligt yvirlit, yvir tær vegagerðir sum framdar eru frá tí at byrjað varð at tosa um vegagerðir í Føroyum.

Tað er soleiðis, at tann fyrsta vegagerðin, sum framd bleiv í Føroyum, var vegagerðin millum Skopun og Sand, og varð hesin vegurin byrjaður í apríl/mai 1914.

Umsóknir vóru nógvar innkomnar bæði undan, undir og aftaná kríggið, og nú var so skjótil settur á og áhugi millum fólk og á tingi var vaksandi, so í 1921, sama ár sum lógin frá 1913 um studning til havnir varð førd ajour, játtaðu ríkis-

myndugleikarnir 80% av útreiðslunum til 5 vegagerðir, 65 km til longdar tilsamans.

Hesar vóru:

Úr Sørvági um Miðvág til Sandavágs.
Úr Havnini til Velbastaðar og Kirkjubøar.
Úr Søldafirði um Gøturnar til Fuglafjarðar.
Úr Kollafirði til Kvívíkar.
Av Sandi til Skálavíkar og Húsavíkar.

Í 1928 varð so studningur av somu stødd játtaður til 14 aðrar vegir, sum tilsamans útgjørdu 75 km.

Hesir vóru:

Úr Klaksvík til Norðoyri.
Av Eiði til Ljósá.
Av Norðskála til Oyrar.
Úr Søldafirði til Lamba.
Av Saltangará til Rituvíkar.
Úr Skálabotni til Funningsbotn.
Úr Lorvik til Fuglafjarðar.
Úr Sandavági til Fúlaklett.
Úr Hvalvík til Saksunar.
Úr Havnini til Argjar.
Úr Sumba til Lopra.
Úr Vági til Porkeris.
Úr Trongisvági um Tvøroyri til Froðbiar.

Í tretivu-árunum høvdu vit slakar 150 km av millumbygdavegum og lógu teir í 14 eindum, harav tann størsta var 25 km til longdar. Í 1935 fingu vit ein nýggjan sáttmála millum Føroyar og Danmark, hin sonevnda finansplanin.

Í hesum sáttmála var avtalað, at hesir vegir skulu verða bygdir:

Úr Fámjin til Øravíkar.
Úr Øravík til Trongisvágs.
Úr Porkeri til Hovs.
Úr Vági til Lopra.
Úr Kvívík til Vestmanna.
Úr Havnini til Kollafjarðar.
Úr Skálabotni til Funningsfjarðar.
Úr Ljósá til Norðskála.
Av Saltangará til Nes.
Úr Lamba til Saltangará.

Hesa vegagerðir, tilsamans 90 km, vóru allar framdar, tá heimsbardagin var av, undantikið tó Oyggjarvegurin og Fjarðavegurin.

Frá undan krígnum og líka fram til 1954 vóru tær árligu játtanirnar mest at samanlíkna við sosialar veitingar enn stuðul til samferðslu og vinnu. Studningurnir vóru smábýttir, og móttakararnir av studningunum nógvir í tali. Í tingsetuni

1954/55 kom so annað lag á. Tá varð størri parturin av ti peningi, sum var settur av á figgjarlógini til vegir, játtaður til at gera ávís vegastrekkir liðug fyri, og varð samstundis samtykt, at í fylgjandi árum skuldi upphæddir av líknandi støddbrúkast til sama endamál.

Áhugin millum politikkarar og fólk annars fyri at fáa millumbygdavegir gjørdar, vaks stórliga, tað var eins og fólk brádliga vóru vorðin var við, at góð vegasambond bygda millum var ein høvuðsáttur í einum nútímans samfelag. Seinastu 25 árini hevur vegabyggingin, og tað har til hoyrir, havt góða undirtøku millum politikkarar og fólk yvirhøvur.

Tann setningur, sum fyri tveimum mannaminnum síðani varð settur, er ikki náddur enn. Tað eru fýra bygdir, sum enn einki samband er fingið við, tað er Gásadalur á Vágoynni, tað er sambandið norður á Trøllanes, tað er sambandið úr Kunoyarbygd um Haraldsund til Klaksvíkar, og so er tað at enda sambandið norður til Múla.

Eg vil ti her at enda í mínum svari heita á tingmenn, um at fylgja ti setningi, sum menn settu sær fyri, fyri umleið 60 árum síðani.

Til 1. spurningin frá Eli Nolsøe, løgtingsmanni, er svarið nei.

Tá fyrri spurningur verður svaraður við einum nei, er ikki neyðugt at svara 2. spurningi.

Til endans í hesum svari havi eg viðlagt eitt yvirlit yvir nýggjar landsvegagerðir síðan 1945, nær tær eru byrjaðar og nær tær er endaðar.

Eisini havi eg lagt við eitt yvirlit yvir umbyggingar av landsvegum, og eitt yvirlit yvir umbygging av kommunalum vegum.

Nýggjar landsvegagerðir síðan 1945

NORÐUROYAR	*Byrjað*	*Liðugt*
Fugloyarvegurin (í gerð)	1974	
Húsar - Mikladals (í gerð)	1972	
Hvannasund - Viðareiðis (partvís)	1963	1965
Klaksvík - Norðdepils	1964	1968
EYSTUROY		
Eiðis - Gjáar - Funningsvegurin	1958	1963
Funningsfirði - Funnings (í gerð)	1978	
Oyndarfjarðarvegurin	1966	1969
Elduvíkarvegurin	1967	1974
Fjarðavegurin	1958	1962
Skipanes - Skálafjarðar	1955	1959
Skála - Skálafjarðar	1955	1959
Selatraðsambandið	1958	1960
Brúgv um Sundalagið	1971	1973
Frá Sundabrúnni til Millum Fjarða		1976

STREYMOY		
Streymnes-Tjørnuvikar	1958	1966
Hósvík-Hvalvík	1950	1955
Kollafirði-Hósvíkar	1961	1964
Oyggjarvegurin, norðari partur	1962	1966
Oyggjarvegurin, syðri partur	1959	1960
Skælingsvegurin	1949	1972
Norðadalsvegurin	1974	1978
Syðradalsvegurin	1979	
Sundsvegurin	1975	1980
Kaldbaksvegurin	1974	1980
VÁGAR		
Bíggjarvegurin	1947	1953
Oyragjáarvegurin og Fútaklett-Hálsin	1962	1966
SANDOY		
Dalsvegurin	1951	1965
Skarvanesvegurin	1949	1952
SUÐUROY		
Sandvíkarvegurin	1967	1969
Trongisvágs-Hvalbiarvegurin	1961	1963
Øravíkar-Hovsvegurin	1956	1959
Víkarbyrgisvegurin	1978	1982

Umbygging av landsvegum

	Ár	
	Byrjað	*Liðugt*
Norðuroyar		
Viðareiðisvegurin (partvís)		1974
Eysturoy		
Gøtuciði-Fuglafjarðar	1969	1977
Runavík-Toftir		1973
Langanes-Søldarfjarðar	1971	1973
Langanesi-Glyvragjógv (í gerð)	1981	
Skála-Skálabotnsgjógv	1977	1982

Streymoy		
Hósvík - Streymnes	1977	1980
Norðuri í Sundum - (Kollafirði) - Vestmanna	1966	1981
Tórshavn - Hórisgøtu (Oyggjarvegurin)	1963	1969
Vágar		
Sandavági - Hálsin	1972	1976
Miðvági - Vatnsoyrar (í gerð)	1982	
Miðvági - Sandavágs	1966	1969
Vatnsoyrum - Sørvágs (í gerð)	1978	
Sørvági - Biggjar	1977	1981
Sandoy		
Skopun - Sands		1977
Sand - Skálavíkar (í gerð)		
Suðuroy		
Trongisvági - Øravíkar (í gerð)	1981	

Umbygging av kommunalum vegum

Eysturoy		
Glyvragjógv - Runavíkar	1971	1974
Gjøgnum Skála (partvís)	1979	1981
Vágar		
Vegur gjøgnum Miðvág		1978
Streymoy		
Ringvegurin í Havn	1979	
R.C. Effersøesgøta	1974	1981
Suðuroy		
Gjøgnum Tvøroyri	1974	1981

100. Fyribilsskipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Ár 1982, týsdagin 9. februar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir, at Sovjetsamveldið fær loyvi við 14 skipum fram til 31. mars 1982 at veiða á konto 20.000 tons afrat ella 40.000 tons tilsamans av svartkjafti upp á sáttmálan fyri 1982.

Viðmerkingar:

Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínamillum fiskiskapi (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvd verða pørtunum at fiska í sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar um eina slíka avtalu fyri sínamillum fiskiskap í 1982 vóru í Moskva 24.-25. september 1981, og samdust partarnir um skipan av fiskiskapinum fyri 1982.

Sambært sáttmálan við Sovjetsamveldið skuldu føroyingar seinri fáa boð um, hvussu ið kvotan uppá 11.000 tons av toski í Barentshavinum skuldi býtast upp á øki, harímillum hvussu nógv ið fiskast kundi á norskum øki. Tann nøgd, ið føroyingar sambært avtaluna við Noreg fáa loyvi at veiða av russisku kvotuni í norskum sjógvi, svarar ikki fultút til nøgdina, ið føroyingar høvdu treytað sær í sambandi við sáttmálan við Sovjetsamveldið. Landsstýrið ætlar at nýta høvið til at taka hetta spurning upp við russar í seinasta lagi, tá ið sovjettiski fiskimálaráðharrin Kamentsev væntandi kemur á vitjan í Føroyum í mars 1982.

Landsstýrið hevur tí ikki ynskt at leggja sjálvan veiðusáttmálan fyri løgtingið, fyrr enn hesar samrøður hava verið.

Sambært løgtingsmál nr. 83/1981 góðkendi løgtingið á konto fiskiskap til 1. mars 1982 við tilsamans 20.000 tonsum. Fyri ikki at tarna sínamillum fiskiskapinum í tíðini inntil sáttmálin er búgvin til endaliga góðkenning skjýtur landsstýrið upp at framleingja slíka fyribilsskipan inntil 31.3. innan fyri eina nøgd upp á 40.000 tons av svartkjafti.

1. viðgerð 12. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 12. februar legði fram soljóðandi

Álit

Uppskotið til samtyktar varð lagt fram av landsstýrinum tann 9. februar 1982 og undir 1. viðgerð 12. í sama mánað beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi sama dag viðgjørt málið, og tekur meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Olsen, Svend Åge Ellefsen, Jørgen Thomsen, Jógvan Sundstein) undir við málinum, meðan minnilutin (Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson) ikki tekur undir við málinum.

2. viðgerð 15. februar. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-2

101. Veðhald fyri lánum til m/tr. »Gullfinnur«.

Ár 1982, týsdagin 9. februar løgdu tingmenninir Atli Dam, Ove Mikkelsen og Adolf V. Hansen fram soljóðandi

Í Samband við viðgerðina av løgtingsmáli nr. 78/1981: Veðhald fyri lánum til m/tr. »Gullfinnur« varð málið við 2. viðgerð aftur beint í figgjarnevndina til nærri kanning av grundgevingum fyri at veita veðhald fyri m/tr. »Gullfinnur«.

Vegna tess, at viðgerðin av løgtingsmáli nr. 78/1981: Veðhald fyri lánum til m/tr. »Gullfinnur« er farin fram, og tí bert broytingaruppskot kann setast til lógaruppskot, verður sum serstakt løgtingsmál lagt fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

1. Løgtingið ásannar, at tørvur er á nýggjari útbyggingarætlanum innan svartkjalfta-

vinnuna enn tær, ið nú fyriliggja almennt. Serliga tørvar at veita monnum greiðu á, í hvønn mun loyvt er at veita íløgur og hvussu hitt almenna ætlar at stuðla slíkum íløgum.

2. Løgtingið ásannar, at almennar stuðulsskipanir so vítt gjørligt eiga at liggja innanfyri »generellar« karmar. Løgtingið minnir tí landsstýrið á givnar tilsagnir um framløgu av stuðulslóggávu at avloysa fyribilslógina í december 1981.
3. Løgtingið ásannar, at høvuðsendamálið við veðhaldsveitingum til m/tr. »Gullfinnur« (P/f Vestur) er tryggjan av veiðuorku til royndarveiðu eftir svartkjafti og til útvegan av svartkjafti størri part av árinum í samband við royndarframleiðslur.

2. viðgerð 9. februar. Uppskotið frá meirilutanum í nevndini pkt. 1 og 2 samtykt við 24-0, pkt. 3 samtykt við 20-0.

---

102. Skipan millum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi í 1982

Ár 1982, fríggjadagin 12. februar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir Løgtingið viðløgdu skipan, dagfest 1. februar 1982, um sínamillum fiskirættindi í 1982 millum Føroyar og EEC.

Viðmerkingar:

1. 15. januar 1982 hava samráðingar verið í Bruxelles millum umboð fyri landsstýrið og EEC-nevndina um sínamillum fiskirættindi í 1982 millum Føroyar og EEC. Úrslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, dagfest 1. februar 1982.

Samráðingarnar 15. januar 1982 vóru framhald av samráðingum í desember 1981

og januar 1982. Av tí at partarnir ikki komu til sættis um eina sínamillum skipan undir áðurnevndu samráðingum hevur eingin formlig skipan og eingin sínamillum fiskiskapur verið higartil í 1982.

2. Loyvda talið á EEC-fiskiskipum at veiða á landleiðini er ikki endaliga ásett enn, men skulu samráðingar verða um henda spurning.

3. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1982 av ósløgdum fiski eru hesar:

Hjá EEC-skipum á landleiðini:

Samlaða nøgdin av svarkjafti og botnfiski er tann sama sum í 1981.

1.250 tons av toski
1.250 tons av hýsu
3.500 tons av upsa
4.800 tons av kongafiski
4.500 tons av blálongu
500 tons av longu
400 tons av brosmu
500 tons av flatfiski
500 tons av ymiskum fiskasløgum
25.000 tons av svartkjafti

Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:

(a) 500 tons av longu og 500 tons av brosmu á Rock All-leiðini. Eisini er loyvt at veiða 750 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í iðnaðarfiskiskapi; í 1981 vóru nøgdirnar tær somu. Eisini er loyvt at veiða 400 t. av blálongu á havleiðunum vestanfyri Skotland (Í 1981 200 tons).

(b) 10.000 tons av tí vestara makrelstovninum; í 1981 vóru nøgdirnar 11.000 tons av tí vestara makrelstovninum og 2.000 tons av tí eystara makrelstovninum.

(c) 6.000 tons av rossamakreli, sama nøgd sum í 1981.

(d) 20.000 av hvítingsbróður, 15.000 tons av nebbasild og 15.000 tons av brislingi; 1981-tølini vóru ávikavist 30.000 tons, 15.000 tons og 15.000 tons. Fiskast kunnu tó eyka 5.000 tons av hvítingsbróður og nebbasild, treytað av, at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður, nebbasild og brisling ikki fer uppum 50.000 tons (í 1981 60.000 tons).

(e) 1800 tons av sild vestan fyri Skotland (eingin kvota í 1981).

(f) 25.000 tons av svartkjafti (í 1981 20.000 tons).

(g) 600 tons av sild í Skagerak; 1981-talið var 650 tons.

(h) 500 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki; í 1981 600 tons.
700 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1981 1.200 tons sum royndarveiða).

(i) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1981 sama nøgd.
(j) 300 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3Ps (St. Pierre og Miquelon).
(k) Eisini verður loyvt at veiða 600 tons av kongafiski í ICES øki XIV (Eysturgrønlandi) (ikki loyvt í 1981).
(l) Loyvt er í 1982 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland (ikki loyvt í 1981).

4. Føroyingar hava, eins og undanfarin ár tryggiað sær, at samráðingar skulu takast upp um áseting av toskakvotu til føroyingar í Grønlandi, um so er at aðrir enn grønlendingar fáa loyvi at fiska tosk í Grønlandi. Somuleiðis er møguligt at krevja samráðingar, um sildarveiðu í Norðsjónum aftur verður loyvd.
5. EEC hevur undir samráðingunum um sinámillum fiskiveiðu fyri 1982 sett sum treyt fyri eini avtalu, at føroyingar átóku sær at skerja laksaveiðuna, visandi til at ein munandi partur av ti laksi, ið verður fiskaður við Føroyar stavar frá áum í EEC-londum.
Av hesi orsøk, og við líknandi áheitanum frá øðrum londum, ið vit hava veiðuavtalu við, í huga, hava føroyingar gingið við til í serligum brævaskifti at vátta, at vit vilja skerja laksaveiðu okkara til 625 tons í 1982/83 og til 750 tons í 1981/82.

Sí skjal 12 A-D.

1. viðgerð 15. februar. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum sama dag legði fram soljóðandi

Álit

Uppskotið varð lagt fram av landsstýrinum 12. februar 1981 og undir 1. viðgerð 15. í sm. mán. í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Olsen, Edmund í Garði og Svend Åge Ellefsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) skilar til:

Av øllum teim mongu sinámillum fiskiveiðisáttmálum, ið tingið í farnu árum hevur havt til viðgerðar, er hesin, ið her er til viðgerðar, so nógv hin versti — so vánaligur, at tað yvirhøvur ikki kann koma til tals at góðtaka hann. »Javnvágin«, ið umrødd verður í rammusáttmála okkara við EEC, er í hesum sáttmála vorðin til grefliga slagsíðu okkum til tap.

Í fyrsta lagi:

Svartkjafturin skal eftir orðalagnum í sáttmálanum viga javnt við 25.000 tonsum hvønn vegin.

Men í veruleikanum er her stórur misjavni. Svartkjafturin í EEC-sjógvi er diddarak og egnar seg bert til ídnað, als ikki til matna. Svartkjafturin í okkara sjógvi er har aftur í móti fullfeitur og egnar seg tí til matna. Roknað í avrciðingarprísi verður tí virðið av tí svartkjafti, ið vit fáa í EEC-sjógvi samanborið við tað virðið, ið EEC fær í okkara sjógvi, sum 1 móti 3. Roknað í útflutningsvirði av virkaðum svartkjafti verður munurin upp aftur størri, ella sum 1 móti 6.

Ella við øðrum orðum í svartkjafti lata vit tí í veruleikanum 3 - 6 ferðir so nógv sum vit fáa.

Í øðrum lagi:

Aftur fyri veiðirættindi í EEC-sjógvi skulu vit lata 16.000 tons av botnfiski. Hesin botnfiskur, veiddu vit hann sjálvir og virkaður, hevði givið stórinntøkur til útróður og fiskavirki, samanlagt eitt útflutningsvirði upp á o.u. 100 mió. kr. Hetta eru listar inntøkur fyri útróður okkara, fiskavirkini og tey fólk, ið har hava vinnu sína og inntøku.

Tey virði, ið vit møguliga fáa aftur fyri frá EEC koma ikki í námind upp móti hesum tali. Her er at hava í huga, at meðan EEC-skip við sínum snørdu trolposum og 14 døgum eyka á Føroya banka hava allan møguleika til at veiða botnfisk okkara, so eru hinir tillutaðu veiðimøguleikar okkara í EEC-sjógvi meir enn ivasamir. Nógv er einki uttan pappírsfiskur.

Í triðja lagi:

Longu í fjør gav landsstýrið EEC-skipum loyvi til at nýta snørdar trolposar — bæði fyri 1981 og 1982-veiði. Slíkt frávik í føroyskari lóggávu útlendingum til handa kann ikki góðtakast.

Í fjórða lagi:

Á sama hátt gav landsstýrið longu í fjør EEC-skipum 14 daga longri troltíð á Føroya banka — í fjør í seinna enda, í ár í fyrra enda. Hetta kann ikki góðtakast.

Í fimta lagi:

Fyri tey 850 tonsini av rækjum, ið vit fáa í Grønlandi, skulu vit lata fult endurgjald til EEC-skip í føroyskum sjógvi. Her verður tá eina ferð enn váttað, at danski ríkisborgararættur in er ikki til hesi fiskiveiði viðvíkjandi.

Í sætta lagi:

Týsk skip fingu frá donsku ríkisstjórnini í fjør loyvi til at veiða 50.000 tons av kongafiski í Eystur-Grønlandi, har av 5.000 til 6.000 tons av toski í hjáveiði. Tað sama er ætlaningin í ár. Vit hava fingið kongafiska-kvotu í Grønlandi upp á 600 tons (har av væl saktans 60 tons av toski í hjáveiði). Her er ójavnt býtt.

Í sjeynda lagi:

Landsstýrið sigur seg hava tryggjað sær samráðingar um toskakvotu í Grønlandi, men bert um so verður, at aðrir enn grønlendingar fyrst fáa loyvi til toskaveiði har (smb. pkt. 4 í framløguskrivi landsstýrisins). Ella við øðrum orðum ikki fyrr enn aðrir longu *hava fingið* toska-kvotu í Grønlandi, sleppa vit at *samráðast* um slíka. Vit verða tí settir aftan fyri aðrar.

Í áttanda lagi:

Longu seinasta heyst legði EEC seg út í lóggávu okkara á egnu landleið okkara.

Landsstýrið hevði tá givið føroyskum laksaveiðimonnum laksakvotu upp á samanlagt 1.600 tons. Hesar kvotur kravdi EEC munandi lækkaðar. Nú hevur so landsstýrið við hesum sáttmála viðurkent EEC-uppiløgging í føroysk innlendis viðurskifti, og bundið seg til at avmarka okkara egnu laksaveiði niður í 750 tons í 1981-82 og niður í 625 tons í 1982-83.

Laksaveiða okkara verður tá minkað við ávikavist 850 og 975 tonsum. Í mistum útflutningsvirði verða hetta millum 40 og 50 mió. kr.

Í níggjunda lagi:

Upplýst hevur verið, at millum tey skip, ið hava fingið laksaloyvi í føroyskum sjógvi, eru 6 EEC-skip (donsk), ið hava fingið kvotu upp á samanlagt 120 tons. Fyri hesi loyvi fáa vit einki aftur fyri frá EEC.

Í tíggjunda lagi:

Tó at einki prógv er fyri tí, hevur landsstýrið mótvegis EEC gingið undir tann pástand, at »munandi partur av tí laksi, ið fiskaður verður við Føroyar stavar frá áum í EEC-londum« og at landsstýrið »av hesi orsøk« er gingið undir avmarkingar í laksaveiði okkara (smb. 5 í framløguskrivi landsstýrisins).

Í ellivta lagi:

Tað er sjálvsagdur lutur, at vit taka lut í millumlanda verndartiltøkum laksastovnunum viðvíkjandi, men treytin fyri, at vit avmarka okkara veiði, má sjálvsagt vera tann, at onnur lond, har í millum EEC-lond, gera slíkt hitt sama. Men um slíkt fyriliggur einki. Laksaveiðan hjá EEC og øðrum londum á havinum sleppur at halda fram ótarnað og óavmarkað. Tað eru bert vit, ið skulu geva okkum undir avmarkingar. Slíkar einsíðugar byrðar á okkum kunnu ikki góðtakast.

Í tólvta lagi:

Samtíðis sum hesin sáttmáli veitir EEC-skipum botnfiskakvotu upp á 16.000 tons, hevur landsstýrið boðað frá minking í okkara egnu royndum eftir botnfiski. Við teimum 16.000 tonsunum til EEC verður henda avmarking upp aftur meinari enn hon annars hevði verið.

Í trettanda lagi:

Har aftur at kemur tað, at við minkaðum laksaveiðimøguleikum noyðast laksaveiðiskipini at leggja ein part av veiði síni um til toska- og hýsuveiði. Har við økist veiðitrýstið eftir hesum fiskasløgum upp aftur meir.

Niðurstøða:

Niðurstøðan av tí, ið her hevur verið ávíst, er samantikið tann, at vit góðtaka vit henda sáttmála — koma at lata nógv meir enn vit fáa. Sjálvt um vit veiða allan tann fisk, ið vit á pappirinum sleppa at veiða í EEC-sjógvi, og sjálvt um vit rokna rækjurnar í Grønlandi upp í — hesar rækjur, ið vit av røttum áttu uttan endurgjald til EEC, kemur hetta virði ikki upp um o.u. 90 mió. kr. Fyri hesar 90 mió. krónurnar skulu vit lata o.u. 140 mió. kr. Ller oman á kemur so laksatapið upp á

40-50 mió. kr.

Hetta vanbýtið kann ikki undir nøktum umstøðum góðtakast.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Ove Mikkelsen) ræður tí løgtinginum frá at góðtaka henda sáttmála.

Ein annar minniluti (Jørgen Thomsen) er av tí áskoðan, at vit prinsipielt eiga at hava fiskiveiðisáttmálar, har tað er gjørligt, men minnilutin ásannar, at úrslitið av samráðingunum við EF er vorðið so vánaligt fyri Føroyar, at skilabetri atferð í 1981 og frægari samráðingarháttur í 1982 áttu at givið betri úrslit.

Minnilutin metir, at politikkur meirilutans í viðurskiftum okkara við EF í 1981 hevur sett okkum í eina rættiliga veika samráðingarstøðu mótvegis EF í 1982. Í fyrsta lagi kom samráðingarnevndin heim við einum úrsliti í fjør, sum varð koyrt igjøgnum tingið á náttartíð, og harvið sýndu vit, at vit vóru altráðir eftir at fáa hendan sáttmálan góðkendan, meðan tað seinri visti seg, at Bretland ikki vildi viðurkenna sáttmálan.

Trá umleið 9 mánaðar vórðu farnir av árinum, segði EF seg til reiðar at góðkenna sáttmálan, og meirilutin her á tingi leyp á leistum. Harvið góvu vit á øðrum sinni til kennar, at vit frá føroyskari síðu vóru altráðir eftir at fáa ein sáttmála við EF. Sjálvandi hevur hetta sett okkum í eina veikari samráðingarstøðu, nú sáttmálin fyri 1982 skuldi avgreiðast.

Javnaðarflokkurin er av tí áskoðan, at vit eiga at vera við í eini altjóða laksakonventión, heldur enn at loyva EF at lóggeva inni á okkara sjóøki, soleiðis sum fyriliggjandi sáttmáli gevur EF møguleika til. Harafturat metir flokkurin, at fólkaatkvøðan í Grønlandi um tess limaskap í EF er av stórum týdningi í hesum sambandi. Flokkurin metir, at um Grønland tekur seg burtur úr EF, eiga vit beinanvegin at taka samráðingar upp við grønlendingar sum borgarar í sama ríki um veiðirættindi okkara har.

Minnilutin kemur til ta niðurstøðu, at sáttmálin við EF ikki eigur at verða góðkendur nú, men at nýggjar samráðingar verða tiknar upp við EF, tá støða Grønlands til EF er greið. Út frá hesum sjónarmiðum setir minnilutin eingi uppskot fram í hesum máli.

2. viðgerð 15. februar. Uppskotið varð samtykt við 17-1 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1198-2/82.

103. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann.

Ár 1982, mánadagin 15. februar varð boðað frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Sverra Midjord, løgtingsmanni, soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Nær fer landsstýrið at seta í verk ætlanirnar um stovnsetan av ansingar- og røktarheimi, sum liggur í samtykt tingsins við keypinum av Loranstøðini og bygningunum í Vági. Víst verður til løgtingsmál nr. 24/1979.

Viðmerkingar:

Í november 1979 legði landsstýrið fram lógaruppskot um keyp av loranstøðini og tilhoyrandi bygningum í Suðuroy.

Løgtingið samtykti uppskotið, sum heimilar landsstýrinum at keypa bygningarnar.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at endamálið við keypinum av bygningunum á Bakkanum, er at teir skulu brúkast sum vistarheim — og at tørvur er fyri heimi til pensjónistar við ymiskum likamligum ella sálarligum brekum.

Tá landsstýrið fyri langari tíð síðani hevur greitt ognarviðurskiftini av loranstøðini við tilhoyrandi bygningum, og nú vit skriva 1982 — og einki er hent viðvikjandi veruligu ætlanini, skrásett í løgtingsviðtøkuni, verður hesin mín spurningur settur fram.

15. februar varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at Eilif Samuelsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

24. februar svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fyrispurningimum soleiðis

SVAR

Fyrispurningurin var soljóðandi:

»Nær fer landsstýrið at seta í verk ætlanirnar um stovnsetan av ansingar- og røktarheimi, sum liggur í samtykt tingsins við keypinum av Loranstøðini og bygningunum í Vági. Víst verður til løgtingsmál nr. 24/1979.«

Løgtingslóg um lán til keyp av loranstøðini í Vági varð samtykt í tinginum 28. apríl 1980.

Danska fíggjarnevndin samtykti 11. februar 1981 at avhenda ognirnar til landsstýrið, og síðani hevur verið arbeitt víðari við at fáa tey neyðugu avhendingar-

skjølini, ognarbrøv v.m. sett upp. Somuleiðis er søkt til hagastýrið fyri Hamrahaga um avtalu um framhaldandi leigu av lendinum.

Tað er landsstýrisins ætlan, tá ið formalitetirnar viðvíkjandi keypinum eru av, at umbyggja húsini á Bakkanum til ein stovn fyri brekað.

Ætlanin er, at vistarheimið í Vági eins og vistarheimini í Havn, Runavík og Norðoya vistarheim, sum er góðtikið av Socialmálaráðnum í hesum døgum, skal verða rikið sum ein sjálvegandi stovnur.

Heimið fær pláss fyri 8 fólkum, fyri tað mesta avlamispensjónistum, at búgva á tí varda pensionatinum, og harumframt verður ein vardur verkstaður, har pláss verður fyri einum 15 fólkum at arbeiða.

Landsstýrið hevur í skrivi til Socialmálaráðið søkt um at fáa góðkent vistarheimið í Vági sambært § 32 í lógini um almannaforsorg.

Tá ið henda góðkenning frá Socialmálaráðnum fyriliggur, verður farið undir at seta húsini í stand og gera neyðugar umbyggingar innanhýsis.

Sostatt kann sigast, at landsstýrið alsamt arbeiðir við at seta í verk ætlanirnar um stovnseting av vistarheimi í Vági eftir teimum sjónarmiðum, sum liggja í samtykt tingsins við keypinum av Loranstøðini og bygningunum í Vági.

---

104. Alment kunngerðablað.

Ár 1982, mánadagin 15. februar legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um alment kunngerðablað.

§ *1.* Frá 1. oktober 1982 stílar landsstýrið fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

lagtingslov om en offentlig kundgørelsestidende.

§ *1.* Fra 1. oktober 1982 udgives ved landsstyrets foranstaltning en offentlig kundgørelsestidende: »Kunngerðablaðið«.

§ 2. Í kunngerðablaðið skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur givnar av landsstýrinum lýsast.

2. stk. Í kunngerðablaðið kunnu eisini upptakast:

a. Lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna.
b. Kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum.

§ 3. Frá 1. oktober 1982 er lýsingin í Kunngerðablaðið einasti bindandi kunngerðahátturin av løgtingslógum v.m. eftir § 2, 1. stk. Verða tær í § 2, 2. stk. nevndu kunngerðir v.m. lýstar í Kunngerðablaðnum, hevur lýsingin sama lóggildi, sum lýsing av løgtingslógum v.m., hesin kunngerðarháttur er tó eingin treyt, um viðkomandi løgtingslóg sjálv ikki krevur hann.

2. stk. Tá ið eitt nummar er tilskilað í løgtingslóglni v.m. kemur hon í gildi vikudagin eftir dagin, tað nummarið av Kunngerðablaðnum, sum hon stendur í, er givið út.

§ 4. Kunngerðablaðið kemur út so ofta tørvur er, tó í minsta lagi eina ferð hvønn mánað.

2. stk. Hvørt nummar skal tilskila dagin, tað kemur út.

§ 5. Alt yvirvald, sorinskrivarin, post-

§ 2. I »Kunngerðabladið« indføres såvel alle lagtingslove som kundgørelser, reglementer og andre offentlige forordninger.

Stk. 2. I »Kunngerðabladið« kann også indføres:

a. Annoncer, meddelser o.l. fra det offentlige.
b. Kundgørelser, reglementer og andre offentlige forordninger i det hele taget fra andre offentlige institutioner end landsstyret, samt meddelelser fra private i retsforhold.

§ 3. Fra 1. oktober 1982 er optagelsen i »Kunngerðabladið« den eneste bindende kungørelsesmåde for lagtingslove m.v., som nævnt i § 2, stk. 1, såfremt de i § 2, stk. 2 nævnte kundgørelser m.v. optages i »Kunngerðabladið«, har optagelsen samme lovkraft, som optagelse af lagtingslove m.v., denne kundgørelsesmåde er dog ingen betingelse, med mindre den er foreskrevet af vedkommende lagtings lov.

Stk. 2. Med mindre andet er foreskrevet i vedkommende lagtingslov m.v., træder denne i kraft ugedagen efter det nummer af »Kunngerðabladið«, som denne er optaget i, er udkommet.

§ 4. »Kunngerðabladið« udkommer så ofte, som der er behov herfor, dog mindst en gang om måneden.

Stk. 2. Hvert nummer skal angive udgivelsesdagen.

§ 5. Al øvrighed, sorenskriver, post-

verk og kommunustýrir fáa ókeypis eintak av Kunngerðablaðnum.

§ 6. Landsstýrið fyrisetir gjøllari reglur fyri útgávuni, útsjónd, haldaragjald, lýsingarprís o.t., eins og landsstýrið gevur út Kunngerðarblaðið har tær løgtingslógir v.m., nevndar í § 2, 1. stk. verða upptiknar. Eisini kunnu kunngerðirnar v.m. eftir § 2, 2. stk. og lógirnar v.m. eftir § 7, takast við í savnið.

§ 7. Landsstýrinum er heimilt eftir avtalu við ríkisstýrið ella ríkismyndugleikar og aðrar myndugleikar í Kunngerðablaðið at upptaka lógir, kunngerðir, lýsingar o.f.

væsen og kommunalbestyrelser får tilstillet eksemplar af »Kunngerðablaðið« uden betaling.

§ 6. Landsstyret foreskriver nærmere regler for udgivelsen, udseende, abonnement, annoncepriser o.l. Ligeledes udgiver landsstyret et »Kunngerðablaðið«, hvori optages de lagtingslove m.v., omhandlet i § 2, stk. 1. Kundgørelserne m.v. efter § 2, stk. 2, og lovene m.v. efter § 7 kan endvidere optages i samlingen.

§ 7. Landsstyret bemyndiges til efter aftale med regeringen eller rigsmyndighederne og andre myndigheder at optage i »Kunngerðablaðið« love, kundgørelser, meddelelser o.l.

Viðmerkingar:

Javnaðarflokkurin metir, at komið er hartil, at spurningurin um alment lýsingarblað eigur at verða tikin upp aftur á Føroya Løgtingi.

Málið hevur sum kunnugt verið til viðgerðar á løgtingi fyrr, men tá fekk tað ikki undirtøku (smb. løgtingsmál nr. 90/1979).

Orsøkirnar til at javnaðarflokkurin metir, at tað er beint at taka málið uppaftur júst nú, eru tær

at tað blaðið, sum, hóast óvandaligan tíðindaflutning úr løgtinginum, kortini virkar sum alment lýsingarblað, nú er farið at bera ærumeiðandi frásagnir úr tinginum,

at hesi ósonnu og illkynjaðu tíðindi gera sítt til at bróta niður virðingina fyri løgtinginum millum manna,

at blaðið, sum nú í meira enn hundrað ár hevur virkað sum lýsingarblað hjá tí almenna, við ranga tíðindaflutningi sínum úr løgtinginum, er við til at bróta niður grundarlagið undir sjálvum fólkastýrinum.

Út frá hesum metir javnaðarflokkurin tað vera bæði ábyrgdarleyst og ómoralskt framyvir at nýta viðkomandi blað, sum jú allir borgarar so at siga hava skyldu at lesa, til alment lýsingarblað.

Fyriliggjandi lógaruppskot svarar orð til annað til uppskotið frá 1979.

Viðmerkingarnar til uppskotið frá 1979 eru saman við einum dømi um skeivan og ósakligan tíðindaflutning hjá núvirkandi almenna lýsingarblaðnum lagdar við hesum máli sum skjølini (1) og (2).

(Skjal 1)

Viðmerkingar:

Málið um alment lýsingartiðindi fyri Føroyar er viðgjørt í løgtingssetunum 1918 (bls. 9), 1932 (bls. 244) og 1937 (bls. 222).

Eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 »om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne« verða ríkislógir og ministeriellar fyriskipanir, hvat tær so eru nevndar, umframt í »Lovtidende« eisini kunngjørdar í ti blaðnum í Føroyum, sum hevur fingið góðkenning at lýsa almennar kunngerðir. Síðani 10. juli 1879 hevur Dimmalætting havt hesa góðkenning. Umframt verða lógirnar v.m. framlagdar á fyrsta vanliga tingdegi í Tórshavn aftaná kunngerðina, jbr. § 2 í lógini.

Meðan kunngerð í blaðnum umframt í »Kunngerðablaðnum« er ein treyt fyri lóggildi, er tinglesingin tað ikki. Undir krígnum var rættarfylgjan bert knýtt at kunngerðini í almenna kunngerðablaðnum, jbr. fyribils kunngerð nr. 2 frá 9. mai 1940.

Tilsvarandi reglur hvussu løgtingslógir og kunngerðir v.m. frá landsstýrinum skulu lýsast eru ikki, tó sigur § 3, 1. stk. í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum, at løgmaður staðfestir og kunngjer løgtingslógirnar, einki verður sagt um kunngerðirnar ella kunngerðarháttin.

Hóast tað eftir hesum ongar skrivaðar reglur eru um kunngerðarháttin, eru ikki bert løgtingslógir, men eisini kunngerðir alment lýstar í kunngerðablaðnum av landsstýrinum, síðani heimastýrið tók við, og er hetta helst gjørt eftir einari analogi frá 1896-lógini. Landsstýrið hevur sostatt kent seg bundið av meginregluni, at lógir og aðrar almennar fyriskipanir skulu lýsast, áðrenn tær eru bindandi fyri borgararnar, jbr. eisini § 22 í grundlógini.

Skipanin higartil hevur í vissum førum verið fyri atfinningum. Í mongum førum eru størri lógir lýstar soleiðis, at tær í brotum eru tiknar í fleiri fylgjandi nummur, eins og tá fleiri lógir hava ligið fyri til lýsingar, hava tær ikki allar kunnað komið við beinanvegin.

So hvørt sum kunngerðatilfarið veksur, at so er sæst av teimum seinastu kunngerðasøvnunum, eru lýsingarnar helst meira ein byrða enn fyrimunur fyri blaðið, lýsingarnar eru ókeypis, heraftrat kann sigast, at tað er principielt skeivt at lata uppgávuna til ávist blað, tí bløðini her eru øll meira ella minni politisk lítað. Náttúrligt er tí, at tann tankin er framkomin, at landsstýrið sjálvt skipar fyri einum almennum kunngerðablaði, við tí rættarfylgju, at lýsingin í hesum er hin bindandi kunngerðarhátturin. Nú eru eisini aðrar almennar frásagnir enn løgtingslógir og kunngerðir frá landsstýrinum, her verður serliga hugsað um lýsingar frá kommununum. Tað er uttan iva ein fyrimunur bæði fyri hann, ið lýsir, og fyri fólk, at tey vita, at hesar lýsingar kunnu lýsast í blaðnum, sum ber boðini um galdandi lógargrundarlag. Ætlanin er tí, at blaðið skal vera eitt lýsingarblað hjá øllum almennum stovnum.

Skulu ríkislógir og ministeriellar kunngerðir lýsast í kunngerðablaðnum, krevst

broyting í galdandi skipan tó ikki lógarbroyting. Skipanin eigur helst at verða broytt soleiðis, at alt lógartilfar verður lýst í ti blaðnum, sum bert er til tað sama.

Hvussu blaðið er ætlað skipað, er ikki tikin endalig støða til enn, men helst verður avtala gjørd við onkra prentsmiðju aftaná útbjóðing.

Skjal (2)

Dinmalætting 13. februar 1982

Vanvirðing av løgtingsstovnunum

Vinstravendir eftirapa bretska formanni Arbeiðaraflokksins

Fyri kortum hóast tíðindi um allan heimin um, hvussu formaðurin fyri bretska Arbeiðaraflokkin hevði tiggjað sær umborð á einum flogfari á veg úr Noreg til Bretlands: hann hevði hildið veljararøðu í einum av hátalarunum umborð á flogfarinum, skenkt whisky til øll umborðverandi, sum ynsktu tað, og gjørt sær og landi sínum fyri skammum. Spurningur er nú heima í Bretlandi, um Arbeiðaraflokkurin er sinnaður fyri at seta ham av sum floksleiðara.

Stutt er frá oðrum til ein sjálvan. Tá ið løgting okkara varð sett í gjáarmorgun kl. 10 møttu ymsir av vinstrahallu tinglimunum við nættiliga fittari kenning, gjørdu um seg, áðrenn formaðurin ringdi við klokkuni og setti fundin, og styttu sær stundir við nærum í leilum at avbróta talararnar, sum leitaðu upp á pallin. Tað var ein syrgilig sjón, og einsamallur mundi ikki ein eldri bygdarmaður, sum leitaður var á hendo fund vera, tá ið hann tunglliga suflandi segði, at »ongantið hevur moralurin á tingi ligið so lágt«.

Onkur annar helt fyri, at tað var spell, at hetta ikki — eins og orðaskiftið um liggjarmál — gjørdi hevði verið útsent í Útvarpinum, so at veljararnir um Føroyaland kundu hoyrt, hvussu ymsir tingmenn vanvirða hægsta politiska stovn landsins, sum teir eru valdir at sita limir í!

1. viðgerð 23. februar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av javnaðarflokkinum 15. februar 1982 og við 1. viðgerð 23. í s.m. beint í lóganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Meirilutin (Agnar Nielsen, Guttorm Klein og Edmund í Garði) kann ikki taka undir við uppskotunum frá javnaðarflokkinum, men heldur, at øll føroysk bløð, sum lúka ásettu treytirnar, eiga at kunna gerast almenn kunngerðabløð. Landsstýrið kannar, hvørjar lógarbroytingar, ið skulu gerast, og leggur so uppskot fyri tingið í samsvar við hetta.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at gera uppskot til tær lógarbroytingar, sum eru neyðugar fyri at føroysku bløðunum kann verða boðið at gerast almenn lýsingarblað á jøvnum føti.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Petur Reinert) mælir til at samtykkja uppskotið frá javnaðarflokkinum.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskotið frá Javnaðarflokkinum fall við 15 ja-atkvøðum, 2 nei-atkvøðum, 15 atkvøddu ikki.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Jona Henriksen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Nei atkvøddu: Jógvan Olsen, Pauli Ellefsen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Ivan Johannesen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í nevndini samtykt við 17-0.

F.L.j.nr. 112-I

105. Løgtingslóg um hýruvognskoyring.

Ár 1982, týsdagin 16. februar legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um hýruvognskoyring.

§ *1.* Landsstýrið kann gera eina standard hýruvognsreglugerð, sum eftir ynski frá eini ella fleiri kommununum kann setast í gildi har við ella uttan broytingum.

§ *2.* Sum hýruvognur er at skilja motorakfar, góðkent og innrættað til flutning av í mesta lagi 9 persónum, førarin viðroknaður, og sum ikki einans verður nýtt til sjúkraflutning ella vanliga rutukoyring, smbr. § 1 í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning.

§ *3.* Í hýruvognsreglugerð kunnu ásetast reglur um innrætting, útgerð, nýtslu, gjøld, hýruvognsstøðir og tal av hýruvognum v.m.

§ *4.* Brot á reglurnar í góðkendari hýruvognsreglugerð ella treytirnar í loyvi til hýruvognskoyring koma undir bót. Er brotið framt av einum felag ella tílíkum, kann felagið koma undir bót.

§ *5.* Henda lóg kemur í gildi beinan

lagtingslov om hyrekørsel.

§ *1.* Landsstyret kan udfærdige et standard hyrevognsregulativ, som efter en eller flere kommuners ønske kan sættes i kraft der med eller uden ændringer.

§ *2.* Ved hyrevogn forstås motorkøretøj, der er godkendt og indrettet til befordring af indtil 9 personer, føreren medregnet, og som ikke udelukkende anvendes til sygetransport eller almindelig rutekørsel, jfr. § 1 i lagtingslov om person- og godsbefordring.

§ *3.* I hyrevognsregulativ kan fastsættes bestemmelser om indretning, udstyr, brug, takster, hyrevognsstationer og antal af hyrevogne m.v.

§ *4.* Overtrædelse af bestemmelserne i et godkendt hyrevognsregulativ eller i betingelserne i tilladelser til hyrevognskørsel straffes med bøde. Er overtrædelsen begået af et selskab eller lignende, kan der pålægges selskabet bøde.

§ *5.* Denne lov træder i kraft straks.

vegin.

2. stk. § 62 í ferðslulógini er ikki galdandi í kommunum við góðkendari hýruvognsreglugerð.

3. stk. Vinnubrøv, sum nýtt eru til hýruvognskoyring áðrenn ein hýruvognsreglugerð verður sett í gildi í einari kommunu, verða framvegis í gildi.

Stk. 2. § 62 i færdselsloven er ikke gældende i kommuner med godkent hyrevognsregulativ.

Stk. 3. Næringsbeviser, der er benyttet til hyrevognskørsel før et hyrevognsregulativ er sat i kraft i en kommune, er forsat gældende.

Viðmerkingar:

Tórshavnar býráð og aksturvinnufelagið Samfylking hava heitt á landsstýrið um at fremja slíkar lógarbroytingar, at heimild fæst til at seta í gildi eina hýruvongsreglugerð fyri kommununa. Eisini hevur Klaksvíkar býráð heitt á landsstýrið um at gera útvegir fyri eini betri skipan av hýruvognskoytingini.

Eftir núgaldandi lóg er hýruvognskoyring frí vinna og eftir vinnulógini er eingin heimild at nokta nøkrum vinnubræv, sum lýkur vanligu treytirnar um aldur og heimarætt.

Eftir § 62 í ferðslulógini hevur landsstýrið heimild til at áseta reglur um hægstatal av akførum, sum hava góðkenning til vinnuligan fólkaflutning og kunnu søkja hýru á vegi. Tað er ógreitt, hvussu henda regla skal skiljast, og gevur hon neyvan heimild til samstundis at áleggja nakrar skyldur.

Í § 2 í uppskotinum er definerað, hvat hýruvognskoyring er. Í lógini um fólka- og farmaflutning er definerað, hvat rutukoyring er. Í einari kommunu við góðkendari hýruvognsreglugerð verður sostatt bert fólkaflutningur við akførum til minst 10 ferðandi og sum ikki kemur undir reglurnar um rutukoyring, frí vinna.

Teir, sum hava koyrt hýruvognskoyring áðrenn ein hýruvognsreglugerð verður sett í gildi í einari kommunu, koma framvegis at kunna halda fram við koyringini á sama hátt sum frammanundan, t.v.s. at tað t.d. ikki kann verða álagt teimum at verða limur í hýruvognsstøð ella at taka lut í vaktarskipanum.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 16. februar 1982 og við 1. viðgerð 24. í s.m. beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild at gera eina standard hýruvognsreglugerð, sum eftir ynski frá einari ella fleiri kommunum kann setast í gildi í økinum við ella uttan broytingum.

Nevndin hevur tann 19. í hs. havt fund við umboð fyri Aksturvinnufelagið

Samfylking, Tórshavn. Teir handaðu nevndini eitt nýtt uppskot til løgtingslóg um hýruvognskoyring, sum er viðtikið á landsfundi hjá aksturvinnufeløgunum tann 14. apríl 1982. Uppskotið er viðlagt.

Hetta uppskotið víkir so nógv frá uppskoti landsstýrisins, at nevndin heldur seg ikki kunna viðgera málið liðugt til framløgu í hesi tingsetuni. Nevndarviðgerðin kann tó halda fram, nú samtykt er, at lógarnevndin skal virka sum millumtinganevnd til viðgerðar av luftfartslóggávuni.

Nevndin setir sostatt fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Viðgerð av løgtingsmáli nr. 105/1981: Løgtingslóg um hýruvognskoyring heldur fram í lóganevndini sum millumtinganevnd.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 514-11-13.

---

106. Veiting av ríkisborgararætti.

Ár 1982, týsdagin 23. februar legði lóganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur 17. december 1981 skrivað tinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 1 frá 25. februar 1981 og lóg nr. 3 frá 27. mars 1981 um veiting av ríkisborgararætti verða lýstar at galda í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.«

Málið varð beint í lógarnevndina, sum hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Asbjørn Joensen, Edmund í Garði, Jákup Lindenskov og Agnar Nielsen) setir fram soljóðandi

UPPSKOT

til

samtyktar

lóg nr. 1 frá 25. februar 1981 og lóg nr. 3 frá 27. mai 1981 um veiting av ríkisborgararætti verða lýstar at galda í Føroyum.

Minnilutin (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 26. februar. Uppskotið til samtyktar samtykt við 22-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 508-3.

---

107. Broyting í biograflógini.

Ár 1982, mikudagin 24. februar legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í biograflógini.

lagtingslov om ændring i biografloven.

§ *1.* Í lóg nr. 117 frá 13. apríl 1938 »om biografteatervæsenets ordning« verður § 20 stk. 1, orðað soleiðis:

»Kvikmyndir, sum verða vístar alment, skulu góðkennast av filmseftirlitinum. Góðkenningin kann verða treytað av, at filmurin ikki verður vístur fyri børnum undir 12 ella 16 ár.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ *1.* I lov nr. 117 af 13. april 1938 om biografteatervæsenets ordning affattes § 20, stk. 1 således:

»Levende billeder skal forinden de forevises offentligt, godkendes af filmstilsynet. Godkendelsen kan være betinget af, at filmen ikke forevises for børn under 12 eller 16 år.«

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk við umboðum fyri filmseftirlit, biografeigarar, filmsútleigarar og landsstýrið at kanna biografviðurskiftini og seta fram uppskot til nýggja lóg fyri biografar.

Arbeiðsbólkurin metir seg ikki hava stundir til at koma við nøkrum samlaðum lógaruppskoti til hesa tingsetu. Bólkurin mælir tó til nú beinanvegin at broyta censurreglurnar, soleiðis at innført verður eitt 12 ára aldursmark afturat, umframt tað núgaldandi aldursmarkið upp á 16 ár. Hetta vil lætta munandi um arbeiðið og útreiðslurnar hjá filmseftirlitinum og biografunum.

Hesi bæði aldursmark verða nýtt aðrastaðni, soleiðis at censureringin í fleiri førum enn nú kann avgreiðast við tí skrivliga tilfarinum sum grundarlag.

Vísandi hertil setir landsstýrið fram uppskot til lógarbroyting um at áseta eitt 12 ára aldursmark umframt núverandi aldursmark í samband við censurering av filmum.

1. viðgerð 26. februar. Málið varð beint í lóganevndina, sum 1. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum 24. februar 1982 og við 1. viðgerð 25. í s.m. beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður ásett eitt aldursmark afturat upp á 12 ár, umframt núverandi aldursmark upp á 16 ár, í samband við sensurering av filmum fyri at lætta um arbeiðið hjá filmseftirlitinum og biografunum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. apríl. § 1 samtykt við 25-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 19. apríl. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 513-27 Lóg nr. 82 frá 26. mai 1982.

108. Um loðdjórahald.

Ár 1982, mikudagin 24. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um loðdjórahald.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað at gera reglugerð viðvíkjandi loðdjórahaldi. Brot móti reglugerðini verða sektað. Málini verða viðgjørd sum løgreglumál.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, og samstundis fer løgtingslóg um minkahald nr. 19 frá 4. mai 1961 úr gildi.

lagtingslov om pelsdyrehold.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at fastsætte nærmere reglement for pelsdyrehold. Overtrædelse af disse regler straffes med bøde. Sagerne behandles som politisager.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks, og samtidig ophæves lagtingslov om minkhold nr. 19 af 4. maj 1961.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 19 frá 4. mai 1961 varð landsstýrinum heimilað at gera reglugerð viðvíkjandi minkahaldi og varð henda reglugerð sett í gildi í 1961.

Arheiðsbólkur er settur til at endurskoða hesa reglugerð, nú áhugin fyri minkahaldi sýnast at verða vaksandi.

Eisini sýnist áhugi at vera fyri øðrum loðdjórahaldi enn minkum, eitt nú revi, chincilla og øðrum.

Tí meinar landsstýrið, tað vera neyðugt við eini heimild, so reglugerðir eisini kunnu setast fyri aling av hesum loðdjórum.

1. viðgerð 26. februar. Málið varð beint í landbúnaðarnevndina, sum 22. april legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 24. februar 1982 og við fyrstu viðgerð 26. februar 1982 beint í landbúnaðarnevndina.

Hetta uppskot miðar ímóti at geva landsstýrinum heimild at gera reglugerð viðvíkjandi loðdjórahaldi.

Í løtuni eru eingir loðdjóraframleiðarar í Føroyum, meðan grannar okkara,

norðmenn og danir, gera rættiliga nógv burturúr hesi vinnu, og hon verður ofta rikin við tilknýti til landbúnað ella aðra vinnu, og skuldi sostatt hóska væl til okkara bygdasamfelag, eisini tá hugsað verður um, at loðdjór fyri størsta partin verða fóðrað við fiskaslógvi, sum vit hava nógv av. Men tann vansi er við loðdjórum, at tey kunnu gera skaða, um tey sleppa út í náttúru okkara og tí má áherðsla leggjast á at girða tey so sæl inni, at hetta ikki hendir.

Við hesum viðmerkingum mælir ein meiriluti (Tórálvur Mohr Olsen, Jógvan Olsen og Øssur Dam Jacobsen) til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Erlendur Patursson og Frederik Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 23. apríl. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 24-0, § 2 við 23-0.

3. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskot frá Paula Ellefsen, Fredrik Olsen, Øssur Dam Jacobsen og Tórálvi M. Olsen varð samtykt við 18-0 atkvøðum. Landsstýrisuppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

23. apríl løgdu tingmenninir Pauli Ellefsen, Fredrik Olsen, Øssur Dam Jacobsen og Tórálvur Mohr Olsen fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Sum 2. pkt. í § 1 verður sett:

»og skal henda reglugerð verða góðkend av løgtingsins lóganevnd«.	»og dette reglement skal være godkendt af lagtingets lovudvalg«.

F.L.j.nr. 1713-9-10 Lóg nr. 78 frá 21. mai 1982.

---

109. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann.

Ár 1982, týsdagin 23. februar boðaði formaðurin frá fyrispurninginum frá Adolf Hansen, løgtingsmanni, soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Ætlar landsstýrið at geva ráfiskagrunninum loyvi til og at heita á grunnin um at hækka ráfiskaprísirnar við 3% beinanvegin, soleiðis at fiskimenn, útróðrarmenn, skip og bátar ikki gerast offur fyri niðurskrivingini av donsku krónuni?

Viðmerkingar:

Orsakað av at føroyska fiskivinnan á sjónum ikki er undirløgd prístalsskipanini, er niðurskrivingin av krónuni tað sama sum ein prislækkan á ráfiski uppá 3%.

Ráfiskagrunnurin kann, við loyvi frá landsstýrinum, broyta avreiðingarprísirnar í úrtíð, um so er at munandi broytingar í prísgrundarlagnum eru farnar fram.

Við tað at fiskimenn, útróðrarmenn, skip og bátar ikki eru undir prístalsskipanini og sostatt onga kompensatión fáa fyri krónuniðurskurðin, má tað haldast rímiligt at nýggir avreiðingarprísir verða ásettir beinanvegin.

24. februar varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

26. februar svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Sum spyrjarin í viðmerkingum sínum vísir á, kann nevndin fyri ráfiskagrunnin sambært lógarinnar § 6, 3. stk. undir serliga munandi broytingum í gjaldoyra- ella søluviðurskiftum taka teir lýstu prísirnar upp til nýggja viðgerð, sjálvt um tíðarskeiðið ikki er úti, og áseta nýggjar prísir fyri tað, sum eftir er av tíðarskeiðinum, freytað av góðkenning landsstýrisins.

Tá ið avreiðingarprísirnir verða ásettir, skal nevndin sambært reglugerðina byggja á upplýsingar og metingar, m.a. um marknaðarútlitini frameftir, soleiðis at avreiðingarprísurin undir vanligum umstøðum skal liggja so nær uppat avrokningarprísinum sum gjørligt.

Í umrøðuni av áseting av avrokningarprísinum verður víst á, at eisini gjaldoyraviðri og gjaldoyraútlit skal havast í huga.

Tað er landsstýrisins uppfatan, at nevndin fyri ráfiskagrunnin sjálv eigur at meta um, hvørt ein niðurskriving við 3% av donsku krónuni yvirfyri øðrum luttakarum í vestureuropeiska gjaldoyra-samarbeiðinum verður hildin at vera ein so týðandi broyting í gjaldoyraviðurskiftunum í mun til tær fortreytir, ið liggja til grund fyri galdandi prísir, at ein broyting í úrtíð av avreiðingarprísunum er tilráðilig.

Um so er, at nevndin fyri ráfiskagrunnin kemur til ta niðurstøðu, at so er, fer landstýrið eins og vanligt at viðgera eitt slíkt uppskot út frá teimum grundgevingunum, ið nevndin kemur við.

110. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Ár 1982, týsdagin 16. februar var boðað frá fyrispurninginum frá tingmonnunum Tórálvi Mohr Olsen og Hans M. Joensen, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Kann landsstýrismaðurin gera so væl at greiða løgtinginum frá, hvussu langt komið er við ætlanunum um nýggja royndarstøð og frá tí, sum hent er í hesum máli, síðan spurningurin um nýggja royndarstøð varð reistur aftur á tingi 31. august 1981?

2. Ætlar landsstýrið at halda fram við kostnaðarkrevjandi ætlanum og projekteringararbeiði, hóast landsstýrið er vitandi um, at løgtingið enn hevur málið um nýggja royndarstøð til viðgerðar?

3. Ætlar landsstýrið at seta nýggja royndarstøð á stovn í Kollafirði, áðrenn løgtingið hevur avgreitt tingmál nr. 10/1981 um nýggja royndarstøð á Sandoynni?

Viðmerkingar:

Í uppskoti til samtyktar dagfest 31. august 1981 (tingmál nr. 10/1981) varð skotið upp at áleggja landsstýrinum at steðga projekteringini av royndarstøð og landbúnaðarskúla á Heygsgarði í Kollafirði.

Í sama málið varð skotið upp at fyrireika royndarstøð við útbúgvingarmøguleikum á Sandoynni.

Málið var eftir 1. viðgerð beint í landbúnaðarnevndina, sum enn ongan fund hevur hildið, hóast hetta hevur verið á formannin fleiri ferðir um at kalla saman til fundar.

Hóast málið sostatt enn ikki hevur fingið nevndarviðgerð, benda tíðindi í bløðum og útvarpi á, at landsstýrið arbeiðir víðari við málinum, sum um einki var hent.

Hetta má metast at vera óheppið bæði frá einum prinsipiellum og fíggjarligum sjónarmiði, og meta vit tí, at alt málið sum tað er má upplýsast fyri tinginum, og loyva vit okkum tí at seta landsstýrismanninum í landbúnaðarmálum henda fyrispurningin.

24. februar varð við 21-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

12. mars svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Tinglimirnir Tórálvur M. Olsen og Hans M. Joensen hava sett mær fylgjandi spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin gera so væl at greiða løgtinginum frá, hvussu langt komið er við ætlanunum um nýggja royndarstøð og frá tí, sum hent er í hesum máli, síðan spurningurin um nýggja royndarstøð varð reistur aftur á tingi 31. august 1981?

2. Ætlar landsstýrið at halda fram við kostnaðarkrevjandi ætlanum og projekteringararbeiði, hóast landsstýrið er vitandi um, at løgtingið enn hevur málið um nýggja royndarstøð til viðgerðar?

3. Ætlar landsstýrið at seta nýggja royndarstøð á stovn í Kollafirði, áðrenn løgtingið hevur avgreitt tingmál nr. 10/1981 um nýggja royndarstøð á Sandoynni?

ad. 1. Til fyrsta spurning er at svara, at tann nevndin, ið undanfarna landsstýri setti til at viðgera spurningin um nýggja royndarstøð, er nú liðug við sítt arbeiði, og fyriliggur nú eitt endaligt skitsuprojekt, ein kostnaðarætlan og ein rakstrarætlan.

ad. 2. Landsstýrið arbeiðir eftir lóg nr. 96 frá 1. november 1978 um byggjan av nýggjari royndarstøð.

Tað er eisini ein rættur og ein skylda hjá landsstýrinum at virka eftir teimum lógum, tingið hevur viðtikið.

ad. 3. Sum áður sagt, so er tað neyðugt at fylgja galdandi løgtingslóg og galdandi landsstýrisviðtøku, og ikki einum hvørjum uppskoti, sum ein ikki veit, verður samtykt.

Eftir galdandi lóg og landsstýrisviðtøku verður nýggj royndarstøð bygd í Kollafirði.

---

111. Broyting í grindareglugerðini.

Ár 1982, týsdagin 23. februar legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Fiskivinnunevndin hevur á fundi 18. februar 1982 viðgjørt skriv frá Einar

Egholm, Streymnes, dagfest 27. juni 1981, sum løgtingið hevur beint í fiskivinnunevndina, sum var soljóðandi:

»Tað hevur verið gamal skikkur frá áraldstíðum, at grindir, sum koma millum Stong og Eystnes, hava verið riknar norður í Sundalagið og verið hildnar til á Hvalvíkaroyri, meðan grindir, sum komu millum Borðuna og Kirkjubønes vórðu riknar á Havnina, altso hildnar til í Tórshavn.

Men nú verður hvør tann einasta grind, sum kemur bæði millum Stong og Eystnes og Borðuna og Kirkjubønes rikin inn til Tórshavnar.

Hetta er nakað, sum eg eri ógvuliga misnøgdur yvir, og eg haldi meg eisini hava varhugan av, at ein stórur partur í Sundalagnum og bygdunum har nærhendis eru tað eisini.

Tað verður tí heitt á Háttvirda Føroya Løgting at avgreiða málið í hesi ólavsøkutingsetuni áðrenn tingið fer aftur til hús.

Ynskini til hesa avgerð eru stór.

Tað stendur eisini í grindavísuni: »Bedst er at holde den nord i Sund«.

So tit siggja jú, at hetta er ein gomul hvalvág frá áralds tíðum.«

Hvørja hvalvág, grindir skulu rekast inn á, er fyriskipað í § 8 í grindareglugerð nr. 21 frá 17. mai 1955, sum sigur:

»§ *8.* Grindaformenninir frá teim ymsu hvalvágum skulu saman við finningarbátinum, um nakar er, og um eingin er, einsamallur stíla fyri hvønn veg, grindin skal rekast, og hvussu raksturin skal fara fram. Her skal serliga gevast ans, hvønn veg grindin sjálv heldur, um hon av sær sjálvum heldur móti onkrari kendari og góðari hvalvág. Er tað ikki so, eigur grindin, alt eftirsum sjóvarfallið, ættin og eisini onnur viðurskifti eru, serliga um grindin er stygg og ring at fáa rakstur á, at rekast inn á næstu hvalvág. Har sum tað ber til, skal ein kend og góð hvalvág takast framum eina heldur ringari, um hon er nærri. Allir hinir bátarnir hava skyldu uttan minsta avvik at reka grindina, so sum omanfyri nevndu menn stíla fyri. Hann, sum heldur ikki hesar reglur, kemur undir sekt. Einhvør, sum hevur skyldu at hava eftirlit við grind, skal beinanvegin, hann er komin til grindina, gjølliga ansa eftir, at reglurnar um rakstur grindinnar verða gjølliga hildnar av hvørjum báti sær. Um so skuldi verið, at gridaformaðurin ella finningarbátur av sjálvsheintingum ella øðrum ógrundaðum orsøkum heldur grind skeiva leið, kemur hann undir sekt.«

Fiskivintunevndin hevur einki uppskot um at broyta hesa reglugerð um grinda rakstur og setir fram

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið hevur einki uppskot um at broyta grindareglugerðina rakstrinum viðvíkjandi.

Eintak av álitinum verður at senda harra Einari Egholm, Streymnes.

2. viðgerð 26. februar. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd, fyrri helmingur, samtykt við 24-0, seinri helmingur, samtykt við 23-0 atkvøðum.

---

112. Løgtingslóg um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy

Ár 1982, miðvikudagin 24. februar legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy.

§ *1.* Studentaskúli við hægri fyrireikingarskeiði verður settur á stovn í Eysturoy, fyribils við Gøtugjógv, sum ein sjálvstøðugur lærustovnur undir landsstýrinum. Skúlin byrjar undirvising í august 1982 sambært lógásettar reglur um slíkan lærustovn. Undirvísingin skal vera á hædd við undirvísingina á øðrum slíkum skúlum í ríkinum.

§ 2. Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy hevur egnan rektara og er fyrisitingarliga og undirvisingarliga skipað á sama hátt sum Føroya Studentaskúli og HF-skeið.

lagtingslov om Gymnasium og HF-kursus på Eysturoy.

§ *1.* Gymnasium med højere forberedelseskursus oprettes på Eysturoy, foreløbig ved Gøtugjógv, som en selvstændig undervisningsinstitution under landsstyret. Skolen påbegynder undervisning i august 1982 i overensstemmelse med lovgivningen om sådanne undervisningsinstitutioner. Undervisningen skal stå mål med undervisningen på andre lignende skoler i riget.

§ 2. Gymnasiet og HF-kurset på Eysturoy har egen rektor og drives administrativt og undervisningsmæssigt på samme måde som Færøernes Gymnasium og HF-kursus.

§ *3.* Næmingaøkið hjá Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoy er Norðoyar, Eysturoy og tann parturin av Streymoynni, ið fevnir um Haldórsvíkar, Saksunnar, Hvalvíkar og Hósvíkar kommunur.

2. stk. Næmingaøkið hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði er tann parturin av Føroyum, ið ikki er nevndur í 1. stk.

3. stk. Landsskúlafyrisitingin kann, um serlig viðurskifti gera tað neyðugt, loyva næmingi úr tí økinum, ið er nevnt í 1. stk., at ganga á studentaskúla ella hf-skeiði í tí økinum, ið er nevnt í 2. stykki og øvugt.

§ *4.* Felags upptøkunevnd verður sett fyri Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy og Føroya Studentaskúla og HF-skeið sambært reglugerð, sum landsskúlafyrisitingin ger fyri upptøkunevndina og fyri upptøku av næmingum.

§ *5.* Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ *3.* Elevområdet for Gymnasiet og HF-kurset på Eysturoy er Nordøyar, Eysturoy og den del af Streymoy, som omfatter Haldórsvíkar, Saksunnar, Hvalvíkar og Hósvíkar kommuner.

Stk. 2. Elevområdet for Færøernes Gymnasium og HF-kursus er den del af Færøerne, som ikke er nævnt i stk. 1.

Stk. 3. Undervisningsdirektoratet kan, såfremt særlige forhold gør det nødvendigt, tillade en elev fra det område, der er nævnt i stk. 1, at gå på gymnasium eller hf-kursus i det område, der er nævnt i stk. 2, og omvendt.

§ *4.* Der nedsættes et fælles optagelsesnævn for Gymnasiet og HF-kurset på Eysturoy og Færøernes Gymnasium og HF-kursus ifølge en vedtægt, som undervisningsdirektoratet udfærdiger for optagelsesnævnet og for optagelsen af eleverne.

§ *5.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 20 frá 23. apríl 1976 um Føroya Studentaskúla og HF-skeið er ásett, at Føroya Studentaskúli og HF-skeið er stovnur undir landsstýrinum, og at deildir av hesum skúla kunnu setast á stovn eftir avgerð landsstýrisins. Tá nú talan er um at seta á stovn nýggjan sjálvstøðugan studentaskúla í Eysturoy, metir landsstýrið seg ikki hava neyðuga heimild til hetta í nevndu løgtingslóg.

Til § 1.

Í sambandi við tilráðing um, hvar í Eysturoy ein komandi studentaskúli við hf-skeiði eigur at verða lagdur, hevur landsskúlafyrisitingin kannað umstøðurnar hesum viðvíkjandi í Runavík, á Glyvrum, í Fuglafirði og við Gøtugjógv.

Í uppriti dagfest 29. apríl 1981 mælti landsskúlafyrisitingin landsskúlaráðnum til at heita á landsstýrið um at skipa fyri, at komandi studentaskúlin við hf-skeiði fyribils verður lagdur við Gøtugjógv.

Á fundi í landsskúlaráðnum 21. mai 1981 fekk hetta tilmæli 2 atkvøður, meðan eitt uppskot, sum kom til atkvøðugreiðslu á sama fundi, um at landsskúlaráðið skuldi mæla landsstýrinum til at taka av tilboðnum frá Runavíkar kommunu um at seta á stovn studentaskúla við hf-skeiði í Runavíkar skúla, fekk 3 atkvøður.

Landsskúlafyrisitingin kom sostatt til ta niðurstøðu, at Gøtugjógv má metast sum best hóskandi plássið at leggja henda skúlan — í hvussu er so fyribils. Við Gøtugjógv eru høli, ið nýtast kunnu til undirvisingina fyrstu tíðina, so at ikki er neyðugt at fara undir stórvegis bygging beinan vegin.

Umframt hetta er vert at leggja dent á, at tað er av týdningi at finna eitt pláss, sum er høgligt í tí øki, har næmingar skúlans skulu koma frá. Sum kunnugt hevur Runavíkar kommuna boðið fram nýggja skúlan í Runavík — til leigu ella keyps — at nýta til studentaskúla og hf-undirvísing. Hesa loysn metir landsskúlafyrisitingin ikki tilráðiliga av tveimum høvuðsorsøkum: a) Runavík liggur í útjaðaranum av næmingaøki skúlans, b) keyp ella søla av skúlanum í Runavík ber við sær, at næmingar fólkaskúlans verða munandi verri fyri — undirvísingarliga sæð, um teir skulu vera nýggja skúlabygningin fyri uttan.

Tá støða skal takast til, hvar í Eysturoy nevndi studentaskúli við HF-skeiði eigur at liggja, mega samarbeiðsmøguleikarnir við aðrar skúlar á sama útbúgvingarstigi eisini havast í huga. Verður studentaskúlin við hf-skeiði lagdur við Gøtugjógv, verður møguleiki fyri samarbeiði við tann komandi handilsskúlan á Kambsdali, har ætlanin er at hægri handilsútbúgving verður boðin næmingunum.

Eisini kann studentaskúlin og hf-skeiðið — um tað verður mett neyðugt — seinri flytast frá Gøtugjógv til annað pláss í Eysturoy. Vert er her at vísa á, at stovnsetanin av sjálvstøðugum studentaskúla við hf-skeiði í Eysturoy helst eigur at metast sum fyrsta lið í eini skúlaútbygging við undirvisingartilboðum á hægri stigi, ið stigvíst eigur at verða veitt ungfólki í norðara partinum av Føroyum. Eysturoyggin er ódyrkað øki í so máta, og neyðugt er her frá byrjan av at vísa varðsemi og ikki læsa seg fastan, ella taka skeivt stig, ið ikki er vendandi aftur frá. Útlit er her sumstundis gjørt til tann útbúgvingartørv, sum er í Norðuroyggjum.

Í skúlaárinum 1981/82 eru 3 hf-flokkar við Gøtugjógv, nevniliga ein 2. hf-flokkur og tveir 1. hf-flokkar. Eysturoyingar, ið hava søkt inn á studentaskúla, eru tiknir inn á skúlan í Hoydølum.

Landsstýrið fer at gera uppskot til nýggja, samskipaða lóg fyri studentaskúlar og hægri fyrireikingarskeið í Føroyum. Harumframt mega gerast nýggjar kunngerðir fyri tær einstøku lærugreinirnar.

Rektarin hevur ábyrgdina av teirri dagligu leiðsluni av skúlanum. Landsskúlafyrisitingin hevur eftirlit við, at tað fakliga støðið er samsvarandi reglum hesum viðvíkjandi. Trygd skal vera fyri, at undirvísingin gevur næmingi haldgott grundarlag at fara undir víðari fakliga útbúgving — eitt nú á lærdan háskúla í øðrum landi.

Til § 2.

Miðað verður ímóti at fáa tvcir sjálvstøðugar studentaskúlar við hf-skeiði at virka

í Føroyum. Hvør skúli skal hava egna leiðslu (rektara) og lærarafólk.

Verandi hf-deildin í Klaksvík skal rekast sum deild undir Studentaskúlanum og HF-skeiðinum við Gøtugjógv. HF-deildin í Suðuroy verður framvegis deild undir Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Deildarleiðari skal vera í Klaksvík og Suðuroy. Deildarleiðarin virkar sum umsitingarleiðari undir rektaranum.

Til § 3.

Býtið í næmingaøki er gjørt fyri at skapa so stórt næmingagrundarlag sum gjørligt undir skúlanum við Gøtugjógv. Brúgvin um Streymin og bergholið í Eysturoy gera tað høgligt hjá t.d. norðstreymoyingum at ferðast inn í Eysturoy.

Til § 4.

Tá tveir studentaskúlar við hf-skeiði fara at virka í Føroyum, verður neyðugt at gera felags upptøkunevnd fyri báðar skúlarnar. Nevndin skal taka støðu til, hvørjir næmingar eiga at takast upp, og hvussu næmingarnir skulu býtast millum skúlarnar. Landsskúlafyrisitingin ger reglugerð um samansetingina av og virkisøkið hjá nevndini.

Meirkostnaðurin av, at studentaskúli við hf-skeiði verður stovnaður við Gøtugjógv frá og við skúlaárinum 1982/83 ætlandi við einum 1. studentaflokki fyrsta skúlaárið umframt framhald av verandi HF-undirvising verður mett til útreiðslur svarandi til:

2 lærarastørv á uml. 150.000 kr.	
ella	kr. 300.000,-
rektaraársløn	— 230.900,-
meirútreiðslur tilsaman	kr. 530.900,-

Um stovnanin av einum 1. studentaflokki við Gøtugjógv í skúlaárinum 1982/83 førir við sær, at tað bert verður ein 1. hf-flokkur bar móti tveimum í skúlaárinum 1981/82, verða nevndu meirútreiðslur svarandi til 2 lærarastørv spardar, og eykaútreiðslan verður tá bert rektaraársløntin umleið 230.900 kr.

1. viðgerð 9. mars. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið, sum snýr seg um stovnan av studentaskúla við hf-skeiði í Eysturoy, fyribils við Gøtugjógv, varð lagt fram av landsstýrinum 24. februar 1982 og undir 1. viðgerð 9. mars 1982 beint í skúlanevndina.

Skúlanevndin hevur undir viðgerðini av málinum havt fund við Eilif Samuelsen, landsstýrismann, umboð fyri landsskúlafyrisitingina, Arnbjørn Mortensen, rektara, og býráðsformannin og onnur umboð fyri Runavíkar kommunu, og skúlanevndin hevur herumframt havt fund á Gøtu skúla við skúlastjóran, bygdaráðsformannin og onnur umboð fyri Gøtu bygdaráð og Runavíkar skúla við skúlastjóran og onnur umboð fyri lærararnar har.

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, gav á fundinum hesar grundir fyri, at landsstýrið hevur mælt til. at studentaskúlin í Eysturoy verður settur á stovn fyribils við Gøtugjógv:

HF-skeiðið er frammanundan har fyri 1.000 kr. um mánaðin í leigu umframt útreiðslur til ljós, hita og reingerð.

eingin byggikostnaður kemur uppá tal,

møguleiki er fyri frálæru yvir stytri sum longri tíðarskeið í samskipan við aðra hægri skúlagongd,

fyrisitingin hevur frameftir betri møguleika at stýra gongdini við nýggjum sjálvstøðugum studentaskúla fyri »eystara meginøkið« í landinum,

stovnan av studentaskúlanum har hevur ikki við sær viðari spjaðing av skúlaskapinum, sum nú hóttir framhaldsdeildirnar kring landið,

geografiska plaseringin er góð og í tráð við ætlanirnar um umfatandi skúlabygging á Kambsdali, hvørs fyrsti partur, handilsskúli, verður projekteraður og síðani bygdur í komandi 3-ára skeiði.

Landsstýrismaðurin upplýsti eisini, at nýggjur studentaskúli í Kambsdali kemur at standa liðugur um eini 4 ár, um farið verður undir projektering komandi ár, og studentaskúlin kemur sostatt at verða liðugur umleið 1 ár eftir handilsskúlan, um farið verður undir bygging rimiligt tíðarskeið eftir, at arbeiðið uppá handilsskúlan er byrjað.

Kostnaðurin av handilsskúlanum uttan kostdeild verður ætlandi einar 13 mió. kr. í dagsprísum, og kostnaðurin av nýggjum studentaskúla í Kambsdali verður leysliga mettur einar 30 mió. kr. í dagsprísum, meðan kostnaðurin av kostdeildunum er óvissur, men kann fyri báðar skúlarnar fara at verða einar 10 mió. kr. Henda sambygging gevur møguleikar at brúka felags hentleikar og útgerð, eins og í vissan mun lærarar.

Landsstýrismaðurin upplýsti at enda, at landsstýrið leggur stóran dent á at fremja vinnuskúlaútbúgvingina.

Til upplýsing landsstýrismansins um leiguna, 1.000 kr. v.m. fyri hf-hølini við Gøtugjógv, skal nevndin leggja aftrat, at landsstýrið kemur at rinda kostnað av umbygging og umvæling her.

Arnbjørn Mortensen, rektari, Hoydalar, upplýsti, at av 116 umsóknum um at sleppa á studentaskúla, matematisku linju, og 103 á málsligu linju í skúlaárinum 1982/83, eru ávikavist 36 og 21 umsóknir úr Eysturoy og Klaksvík, meðan restin, umleið 80 umsóknir, á hvørji linju eru til skúlagond í Hoydølum. Hetta gevur 3 studentaskúlaflokkar í Eysturoy og 10 studentaskúlaflokkar í Hoydølum, og stórur

dentur varð lagdur á, at studentaskúlin hevur skyldu til og onga lógarheimild til at nokta at taka næmingar upp í studentaskúla, tá framhaldsdeildin hevur innstillað teir. Í skúlaárinum 1982/83 verða, um ongin studentaskúli kemur aftrat, tilsamans 612 studentaskúla- og hf-næmingar til skúlagongd í Hoydølum, og tá, um so verður, 13 flokkar koma aftrat og 8 flokkar fara úr skúlanum í ár, verða 5 flokkar fleiri í Hoydølum frá komandi skúlaári. Skúlin er bert ætlaður at rúma 288 næmingum og longu sum er, eru hølisviðurskiftini ógvuliga trong, og t.d. fakhølini eru í dupultari nýtslu.

Tilsamans 612 studentaskúla- og hf-næmingar verða til skúlagongd í Hoydølum skúlaárið 1982/83, um eingin studentaskúli kemur aftrat, og tá skúlin í alramesta lagi kann hava 530 næmingar í Hoydølum, verða tilsamans 82 studentaskúla- og hf-næmingar, sum ikki kunnu takast upp her.

Áðrenn fundurin varð hildin *á Gøtu skúla við Gøtugjógv*, sá skúlanevndin nýggja skúlan frá 1974, skúlan frá 1929, har hf-skeiðið nú hevur innivist, og skúlan frá 1887, har nakrar skúlastovur framvegis eru í nýtslu.

Í nevndu 3 húsum eru umframt høli til fólkaskúlan í nýggja bygninginum hesi høli til taks ella kunnu útvegast:
Í skúlanum frá 1887 4 skúlastovur og/ella valbólkarúm,
í skúlanum frá 1929 6 7 skúlastovur og
í skúlanum frá 1974 til nýtslu í felag við fólkaskúlan serstovur og annað og einar tvær vanligar skúlastovur, tað er tilsamans høli svarandi til einar 12-13 skúlastovur. Serstovan til fysik/kemi landalæru/biologi er útgjørd til verandi nýtslu hjá HF-skeiðinum.

Í Runavíkar skúla sá skúlanevndin fyrst hølini, sum eru 12 í tali, heruppií serstovur til fysik/kemi landalæru/biologi og sang/musikk.

Síðani varð fundur hildin, har umboðini fyri skúlan upplýstu, at um studentaskúlin við hf-skeiði fær innivist á Runavíkar skúla, kunnu allir næmingar í framhaldsdeild fólkaskúlans har flytast til Glyvra skúla. Har eru neyðug serhøli, sum vórðu nýtt, áðrenn Runavíkar skúli varð tikin í nýtslu og so scint sum fyri 2 árum síðani, tá hitaanleggið har varð umlagt. Serhølini í Glyvra skúla eru størri enn hølini í Runavíkar skúla.

Tað eru 60 næmingar færri enn av fyrstani tíð ætlað til skúlagongd í Runavíkar kommunu sum er, og hetta hevur m.a. samband við, at síðani 1978 eru næmingar úr Fuglafirði, Leirvík og Gøtu heimtiknir til skúlagongd, næmingar í realdeild, nú framhaldsdeild av Toftum v.m. heimtiknir til Tofta skúla og valbólkar í 8., 9. og 10. flokkum heimtiknir til avvarðandi skúlar í sunnara parti av Eysturoy.

Umboðini fyri Runavíkar skúla mettu, at prógvgrundirnar fyri at leggja Studentaskúlan og HF-skeiðið við Gøtugjógv ella í Kambsdali kanska kunnu vera beinar, men prógvgrundirnar fyri ikki at leggja studentaskúlan og hf-skeiðið í Runavík, eru skeivar. Runavíkar kommuna er ikki ein útjaðari, men eitt vaksandi miðdepil í Eysturoynni. Vist varð eisini á, at Runavíkar kommuna hevur søkt um at fáa studentaskúlan síðan 1969-70.

Á fundinum við umboðini fyri Runavíkar kommunu undirskrivaðu hesi umboð, at kommunan metir seg hava heilt forsvarligar grundir fyri at bjóða skúlan í Runavík til leigu ella sølu til hægri skúlagongd.

Aftaná henda fund hevur skúlanevndin fingið skrivligt tilboð frá Runavíkar kommunu um at fáa skúlan í Runavík til keyps fyri umleið 4,8 mió. kr.

Skúlanevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Óli Breckmann, Guttorm Klein og Ivan Johannesen) mælir til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt við teirri broyting, at studentaskúlin við hf skeiði verður settur á stovn í Eysturoy, fyribils í Runavík, og setir ti til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1 verður í staðin fyri »við Gøtugjógv« sett: »í Runavík«.

I § 1 indsættes i stedet for »ved Gøtugjógv«: »i Runavik«.

Ein minniluti (Finnbogi Isaksen) metir, at tað ikki er nóg nógv at hava 2 studentaskúlar. Talið eigir at vera 5 ella 6, nú øll ungfólk millum 16 og 19 ár, sum frá líður, skulu hava hægri almenna útbúgving.

Nú flutt verður úr Havn, eigur næst fólkarikasta pláss at verða nýtt, t.e. Klaksvík, har bæði skúlahøli og skúlaheimspláss eru tøk, meðan skúlin ikki eigur at verða stovnaður í miðøkinum, og bæði Runavík og við Gøtugjógv hoyra til miðøkið.

Hesin minnilutin setir ti í fyrstu syftu til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 1 verður í staðin fyri »Eysturoy, fyribils við Gøtugjógv« sett: »Klaksvík«.

I § 1 indsættes i stedet for »Eysturoy, foreløbig ved Gøtugjógv«: »Klaksvik«.

Hesin minnilutin mælir í aðru syftu til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt.

Ein annar minniluti (Jóannes Dalsgaard) tekur undir við uppskotinum um at seta á stovn sjálvstøðugan studentaskúla í Eysturoy og tekur samstundis undir við viðmerkingum landsstýrisins til lógaruppskotið um hendan skúla.

Samstundis vísir minnilutin á plásstrotið í Høydølum, sum hevur gjørt arbeiðsumstøðurnar hjá næmingum og lærarum ógvuliga torførar.

Minnilutin vísir á, at allur spurningurin um útbúgvingina hjá teimum 16-19 ára gomlu er til umhugsingar í hesum døgum. Alt bendir á, at hetta fer at føra við sær, at fleiri útbúgvingarmiðstøðir fyri víðari teoretiskari og fakligari útbúgving verða settar á stovn úti um alt landið.

Tað er tí umráðandi, at einki verður gjørt, sum kann órógva ella forða eini tílíkari

útbúgvingarroynd, og tí er eisini umráðandi at komandi studentarskúlin í Eysturoy verður lagdur har, hann best hóskar inn í hetta komandi útbúgvingarmynstur.

Í hesum sambandi kann minnilutin bert vera samdur við landsstýrismannin og við landsskúlafyrisitingina í tí, at samarbeiðsmøguleikarnir við aðrar hægri skúlaformar eiga at vera avgerandi fyri, hvar skúlin verður lagdur, bæði fyribils og í framtíðini.

Sum kunnugt er eftir løgtingssamtykt farið undir at projektera vinnuskúla í Kambsdali og gevur hesin komandi vinnuskúli við t.d. hægri handilsskúla, frálíkar møguleikar fyri fakligum, pedagogiskum og praktiskum samarbeiði í framtíðini.

Somuleiðis eigur eisini at verða mint á møguleikarnar fyri samstarv við HF í Klaksvík.

Minnilutin metir tað vera beint at undirstrika, at tann í lógaruppskotinum nevnda plasering er fyribils og samstundis minna á, at landsstýrismaðurin á fundi í skúlanevndini hevur lovað at seta í gongd projektering av studentaskúla í Kambsdali, skjótast til ber.

Minnilutin er sannførdur um, at tann fakliga og pedagogiska mest forsvarliga loysnin er tann, sum leggur vinnuskúla og studentaskúla so nær upp at hvørjum øðrum sum møguligt og helst undir sama taki.

Fyrimunirnir við hesum eru so innlýsandi, at tað ikki er neyðugt at nevna teir.

Út frá hesum meir minnilutin, at uppskot landsstýrisins gevur teir bestu samarbeiðsmøguleikarnar miðtum studentaskúlan og vinnuskúla í framtíðini og hervið bestu nýtslu av øllum ressoursum, fakligum eins væl og økonomiskum, og mælir minnilutin tí løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

24. apríl legði Óli Breckmann, løgtingsmaður fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið í gjøgnum Landsskúlafyrisitingina at taka upp samráðingar við Runavíkar kommunu um keyp av skúlanum í Runavík fyri 4,8 mió. kr. við tí fyri eyga at seta á stovn sjálvstøðugum studentaskúla fyri eystara meginøkið. Samráðingarúrslitið verður at leggja fyri Løgtingið í ólavsøkutingsetnni 1982.

Viðmerkingar:

Av tí at neyðugt verður við einum nýggjum studentaskúla í Føroyum, og allir myndugleikar mæla til Eysturoynna, metir uppskotsstillarin, at ein loysn sum henda

at keypa ein tíðarhóskandi skúla fyri 4,8 mió. kr. til endamálið, er tiggjarliga og búskaparliga meiri skynsamt enn at byggja nýggjan studentaskúla fyri 40 mió. kr. aðra staðni í Eysturoynni.

Fyri nevndu 40 mió. kr. kunnu fleiri vinnuskúlar verða settir á stovn.

Útbúgvingarliga er tað ein fyrimunur fyri næmingarnar á HF- og studentsstøði at sleppa at ganga í skúlan í Runavík við 1200 m² av gólvvídd enn í Gøtugjógv, sum bert hevur um 650 m² gólvvídd at bjóða næmingunum komandi 4 árini.

Landskassin verður eisini troyttur fyri nevðugan umbyggingarkostnað við Gøtugjógv longu í ár, meðan skúlin í Runavík er klárur at flyta í.

2. viðgerð 24. apríl. Broytingaruppskot frá minniluta (Finnbogi Isaksen) fall við 10-0. Broytingaruppskot frá meirilutanum í nevndini fall við 15-0. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 25-0, §§ 2-4 við 25-0, § 5 uttan atkvøðugreiðslu.

28. apríl løgdu tingmenninir Ivan Johannesen og Svend Aage Ellefsen fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Løgtingið áleggur landsstýrinum:

1) Saman við landsskúlafyrisitingini at taka upp samráðingar við bygdaráðini í Vágum at kanna møguleikarnar fyri at fáa sett á stovn HF-undirvising í Vágum.
2) At skunda undir fyrireikingarnar til eina fiskivinnuútbúgving.
3) Tá Fiskivinnu- og Fiskiidnaðarskúli skal setast á stovn, positivt at umhugsa, at leggja hann í Vágum.

Viðmerkingar:

Vísandi til hjálagda skriv frá felagskommununum í Vágum, loyva undirritaðu tingmenn sær at seta fram hetta broytingaruppskot við 3. viðgerð av tingmálinum um Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy.

Felagsskapurin av kommununum í Vágum.

Føroya Løgting
3800 Tórshavn.

Viðv. málinum um Studenta- og H.F. undirvísing.

Á fundi í Sandavági tann 26. apríl 1982, har øll bygdaráðini uttan Mykinesar bygdaráð vóru umboðað, hevur felagsskapurin av kommununum í Vágum viðgjørt spurningin um studentaskúla og H.F. undirvísing.

Bygdaráðini gera vart við, at tá lógin um Studentaskúla og H.F. skeið í Eysturoy

er viðtikin, og undirvísingin skipað, eru Vága og Sandoyar sýslur tær einastu sýslurnar í landinum, ið ikki hava undirvísing til students- ella H.F. prógv at bjóða heimabúgvandi ungfólkinum.

Tað er væntandi, at tess fleiri slíkar skúlar ið settir verða á stovn, tess fleiri næmingar taka prógv.

Tað er eisini væntandi, at flestir av hesum næmingum verða ættaðir av plássum, ið nærmast liggja skúlunum.

Sostatt fara ung frá teimum pørtum av landinum, sum ikki hava skipaða undirvísing eftir 10. ár, ikki í eins stórt mál, sum ung aðrastaðni frá, at nema framhaldandi undirvísing, og verða ti ikki kappingarført við bini, tá umræður at koma fram í samfelagnum.

Bygdaráðini í Vágum meta, at tað er umráðandi fyri komandi ættarlið at H.F. undirvísing, sum skjótast verður sett á stovn her vesturi.

Leggjast kann aftrat, at kommunufelagsskapurin á fundi 2. mei 1980, hevur viðgjørt fyriliggjandi mál og hevur sent landsskúlafyrisitingini skriv hesum viðvikjandi.

Annars eru bygdaráðini vitandi um, at leingi hevur verið tosað um og arbeitt við málinum um fiskivinnuútbúgving í Føroyum.

Í hesum sambandi minna bygdaráðini á, at tað er mangt sum talar fyri at slík undirvísing eigur at verða løgd í Vágum.

Eyðvitað er, at tað saman við ti teoretisku frálæruni, eisini mega gevast møguleikar fyri praktiskum arbeiði innan fiskaframleiðslu og innan annað, sum hevur við fiskivinnuna at gera. Slíkir møguleikar gevast í ríkt mál í Vágum.

Millum annað kann verða nevnt:

Tvey flakavirki. »Snarfrost« í Miðvági og »Flakavirkið í Sørvági«.

Nýggja konservesvirkið »Kovin« hjá Sandavágsfólkum, sum er einasta konservesvirki í landinum.

Stóri og vælskipaði maskinverkstaðurin hjá J.K. Joensen og soni, har so at siga øll vanlig og óvanlig fiskiamboð verða framleidd og umvæld.

Haraftrat eru góðir møguleikar fyri aling, bæði av laksi, kræklingi o.ø.

Vísandi til framman fyristandandi, loyva vit okkum at heita á landsmyndugleikarnar, um sum skjótast, at skipa fyri H.F. undirvísing og at seta á stovn ein Fiskivinnu- og Fiskiídnaðarskúla í Vágum.

Sandavágur tann 26. apríl 1982.

V/ Felagsskapurin av kommunum í Vágum

Jóanis Nielsen, form.

Tingmenninir Vilhelm Johannesen, Atli P. Dam, Anfinn Kallsberg, Eli Nolsøe,

Finnbogi Isaksen, Sverre Midjord, Flemming Mikkelsen, Ove Mikkelsen og Guttorm Klein løgdu fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT
til

broytingaruppskot frá Ivan Johannesen og Svend Åge Ellefsen í løgtingsmáli nr. 112/1981: Løgtingslóg um Studentaskúla og HF skeið í Eysturoy.

Punkt 3) verður orðað soleiðis:

Tá fiskivinnu- og fiskiídnaðarskúlar verða settir á stovn, positivt at umhugsa, at leggja ein í Vágum, ein í Norðoyggjum og ein í Suðuroy.

3. viðgerð 28. apríl. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum. Uppskot til samtyktar frá Óla Breckmann v.fl. fall við 15-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Ivan Johannesen og Svend Åge Ellefsen pkt. 1 og 2 samtykt við 22-0 atkvøðum. Undirbroytingaruppskot pkt. 3 fall við 12-0 atkvøðum, pkt. 3 í broytingaruppskotinum frá Ivan Johannesen og Svend Age Ellefsen fall við 5-0 atkvøðum.

F.I.,j.nr. 2118-6-1 Lóg nr. 76 frá 21. mai 1982.

---

113. Veðhald fyri lánum til Føroya Ídnaðargrunn og Menningargrunn Ídnaðarins.

Ár 1982, friggjadagin 26. februar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til Føroya Ídnaðargrunn og Menningargrunn Ídnaðarins.

lagtingslov om garanti for lån til Færøya Idnaðargrunn og Menningargrunn Idnaðarins.

§ *1.* Menningargrunni Ídnaðarins verður loyvt, umframt hansara árligu lániheimild sambært § 6 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, sum broytt við løgtingslóg nr. 10 frá 16. januar 1980 og við løgtingslóg nr. 89 frá 18. september 1980 at upptaka lán frá Nordiska Investeringsbanken svarandi til mótvirðið av 15 mió. norskum krónum.

§ *2.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri hesum lánum til Føroya Ídnaðargrunn og Menningargrunn Ídnaðarins:

a) *Føroya Ídnaðargrunnur:*
Mótvirði av nkr. 35 mió., tikið sum uttanlandslán soleiðis:
50% DM, 25% Sfc og 25% Hfl.

b) *Menningargrunnur Ídnaðarins:*
Mótvirði av nkr. 15 mió. tikið sum uttanlandslán soleiðis:
50% DM, 25% Sfc og 25% Hfl.

§ *3.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

§ *1.* Menningargrunnur Ídnaðarins får tilladelse til, ud over den årlige lånehjemmel i henhold til § 6 i lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973, som ændret ved lagtingslov nr. 10 af 16. januar 1980 og ved lagtingslov nr. 89 af 18. september 1980 at optage lån fra Nordiska Investeringsbanken, svarende til modværdien af 15 mill. norske kroner.

§ *2.* Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at garantere for disse lån til Føroya Ídnaðargrunn og Menningargrunn Ídnaðarins:

a) *Føroya Ídnaðargrunnur:*
Modværdien af nkr. 35 mill. optaget som udenlandslån således:
50% DM, 25% Sfc og 25% Hfl.

b) *Menningargrunnur Ídnaðarins:*
Modværdien af nkr. 15 mill. optaget som udenlandslån således:
50% DM, 25% Sfc og 25% Hfl.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Talan er um lán frá Nordiska Investeringsbanken undir sonevndu regionallánsskipan bankans.

Á fundi í Nordisk Ministerråd í Oslo tann 4. februar 1980 varð samtykt at av ialt 325 mió. nkr. rammuhædd viðvikjandi Nordisk Investeringsbanks Regionallåneforordning, skuldi tillutast Danmark 50 mió. kr.

Samstundis varð samtykt at kanna um Føroyar kundu fáa part av danska lutinum.

Fyri Danmark kundi Direktoratet for Egnsudvikling verða lántakari, men gjørdi hesin stovnur ikki brúk av hesum møguleika.

Eftir at landsstýrið á samráðingum við danskar myndugleikar hevði tryggjað sær at beinleiðis lán til Føroya undir regionallánsskipanini ikki nýttist nerva aðrar føroyskar fíggjarmøguleikar, eitt nú undir egnsudviklings-skipanini, heitti landsstýrið í skrivi frá 5. juni 1981 á ríkismyndugleikarnar um at fáa størst møguligan part av tí kvotu, ið varð tillutað Danmark, veitta sum lán beinleiðis frá

Nordisk Investeringsbank til Føroyar. Landsstýrið yuskti at lánifæið kundi nýtasi bæði til grundíløgur (infrastruktur) og til figgjan av vinnuligum iløgum, serliga í nýggjar vinnur.

NARP (Nordisk embedsmandskomite for regional politik), NIB (Nordiska Investeringsbanken) og umboð fyri landsstýrið viðgjørdu málið á fundi 14. september 1981.

1. oktober 1981 vóru samráðingar við umboð fyri NIB í Føroyum, og varð avgjørt at mæla til yvir fyri Nordisk Ministerráð at umrøddu nkr. 50 mió. verða útvegaðar Føroya Ídnaðargrunni við 35 mió. nkr. (70%) og Menningargrunni Ídnaðarins við 15 mió. nkr. (30%).

Føroya Ídnaðargrunnur og Menningargrunnur Ídnaðarins hava tann 12. januar 1982 søkt um lán ávikavist 70% og 30% av 50 mió. nkr. frá NIB og í skrivum til umsøkjararnar dagfest 3. februar 1982 hevur NIB sagt frá, at lánini eru játtað á fundi tann 2. februar 1982.

Lánini, sum eru treytað av landskassaveðhaldi, kunnu verða upp til 12 ár long, 2 tey fyrstu árini avdráttarfrí. Føroya Ídnaðargrunnur og Menningargrunnur Ídnaðarins hava tikið av, við fyrivarni av lógarheimild, og hava báðir grunnarnir hildið seg til hesa gjaldoyrablanding:

50% DM — renta 10,50% p.a.
25% Sfc — renta 8,25% p.a.
25% Hfl — renta 12,50% p.a.

Landsstýrið metir hetta býtið skilagott, við gjaldoyrasamansetingini av samlaðu almennu lániskuldini í huga.

Viðvíkjandi støðutakan Føroya Ídnaðargruns til lánispurningin sum heild, verður í skrivi dagfest 17. november 1981 m.a. sagt:

»..... stýrið fyri Føroya Ídnaðargrunn hevur samtykt at taka ímóti og umsita einum láni frá NIB uppá 70% av 50 mió. nkr. ella umleið 43 mió. føroyskar krónur.

Lántøkan er treytað av

at hon ikki órógvar rentupolitikk grunsins, sum miðar ímóti at veita so ódýr lán sum gjørligt,

at møguligur rentumunur millum útlánsrentu grunsins og rentuna av hesum láni, verður latin grunninum sum rentustudningur,

at grunnurin fær loyvi til at lata part av peninginum standa í høgtrentaðum obligatiónum til at lætta rentumunin og

at møguleikar grunsins framhaldandi at fáa lán frá Íleggingargrunninum fyri Føroyar ikki verða skerdir.

Føroya Ídnaðargrunnur hevur í dag eina lántøku uppá 75,8 mió. kr.

Útlánsrenta grunsins er í dag 10% p.a., meðan meðalrentan av fingnum lánum í løtuni er 9,11% p.a.

Vísandi til hetta verður Føroya landsstýrið biðið um at skipa so fyri, at § 3, 2. stk. í viðtøkunum fyri grunnin sambært kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971 við broyting frá 24. februar 1981, verður broytt samsvarandi hesi nýggju lántøkuni,

soleiðis at »80 milliónir krónur« verður broytt til »120 milliónir krónur«.«

Viðvikjandi støðutakan Menningargrunn Ídnaðarins til lánispurningin sum heild, verður í skrivi dagfest 27. oktober 1981 m.a. sagt:

»..... grunnurin hevur nevnda lán fyri neyðini og bleiv ti samtykt, at heita á landsstýrið at skipa so fyri, at grunnurin fær heimild til nevndu lántøku við landskassaveðhaldi.

Tað skal viðmerkjast, at nevnd grunsins metir hesa lántøku, sum eykalán og tí má § 6 í løgtingslóg um Menningargrunn ikki á nakran hátt broytast, tá tað er neyðugt hjá grunninum, áhaldandi at hava møguleika, at fáa ódýr lán, vegna ta vána trygd, grunnurin fær, sum almennur lánistovnur. Eisini skal hugsast um tann studning, grunnurin veitir.«

Lánini verða sum áður nevnt yvir 12 ár, tey 2 fyrstu avdráttarfrí.

Um heimildarlógin verður samtykt, ætlar stýrið og stjórn fyri Nordiska Investeringsbanken at koma til Føroya 18. mars í ár at undirskriva lánisáttmálar.

Við tað at lániheimild Menningargrunn Ídnaðarins sambært løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, § 6, sum broytt við løgtingslóg nr. 10 frá 16. januar 1980 og við løgtingslóg nr. 89 frá 18. september 1980, er avmarkað til 5 mió. kr. árliga, verður skotið upp í § 1, at loyva hesi lántøku frá Nordisk Investeringsbank út um vanliga lánimarkið hjá grunninum.

1. viðgerð 8. mars. Málið varð uttan orðaskifti beint í figgjarnevndina, sum 16. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 26. februar 1982 og undir 1. viðgerð tann 8. mars beint í figgjarnevndina.

Eftir at lógaruppskotið er sett fram, hevur lángevarin Nordiska Investeringsbanken, Helsingfors, heitt á landsstýrið um at broyta orðingina av § 1, seinasta petti og av § 2 fyri at fáa besta samfalslag millum lógarorðingina og útinningina av teimum lógfrøðiligu skjølunum, ið skulu útvegast til avgreiðslu av slíkum uttanlandslánum. Í lógarevninum ella substansinum er sostatt eingin broyting.

Figgjarnevndin hevur á fundi tann 12. mars 1982 viðgjørt uppskotið og fingið tilfar og frágreiðing um uppskot um formellu broytingina.

Í telex ljóðar henda:

»att uppta från nordiska investeringsbanken motsvarande høgst 15 mill. nkr. i de valutor, till de beløpp och på de villkor i øvrigt som framgår av låncavtalet med banken«

2. Lagførslaget om landsstyrets garantibemyndigande:

»Landsstyret bemyndigas på landskassans vegnar att garantera før følјande lån enligt låneavtal mellan nordiska investeringsbanken och faeroya idnaðargrunnur respektiva menningargrunn idnaðarins.«

a) Føroya Ídnaðargrunnur
møværdet av nkr. 35 mill. som lån i utlandska valutor enligt følјande:
dem 6.940.000,-
chf 2.785.000,-
nlg 3.805.000,-

b) Menningargrunnur Ídnaðarins
motværdet av nkr. 15 mill som lån i utlandska valutor enligt følјande:
dem 2.975.000,-
nlg 1.630.000,-
chf 1.195.000,-

Ein samd figgjarnevnd mælir til at broyta lógaruppskotið sum frammanfyri tilskilað og setur fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT
til
uppskot landsstýrisins

§ 1 verður soljóðandi:
»§ *1.* Menningargrunni Ídnaðarins verður loyvt, umframt hansara árligu lániheimild sambært § 6 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, sum broytt við løgtingslóg nr. 10 frá 16. januar 1980 og við løgtingslóg nr. 89 frá 18. september 1980 at upptaka lán frá Nordiska Investeringsbanken svarandi til mótvirði av hægst 15 mió. norskum krónum í teimum gjaldoyrum til tær upphæddir og eftir teimum treytum, sum annars ganga fram av lánisáttmálanum við bankan.«

§ 1 bliver sålydende:
»§ *1.* Menningargrunnur Ídnaðarins får tilladelse til, ud over den årlige lånehjemmel i henhold til § 6 i lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973, som ændret ved lagtingslov nr. 10 af 16. januar 1980 og ved lagtingslov nr. 89 af 18. september 1980 at optage lån fra Den Nordiska Investeringsbanken, der svarer til modværdien av højst 15 mill. norske kroner i de valutaer, på de beløb og i henhold til de betingelser, som iøvrigt fremgår af lånekontrakten med banken.«

§ 2 verður soljóðandi:
»§ *2.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri fylgjandi lánum sambært lánisáttmálar millum Nordiska Investeringsbanken og Føroya Ídnaðargrunn

§ 2 bliver sålydende:
»§ *2.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for følgende lån i henhold til lånekontrakten mellem Den Nordiska Investeringsbanken og Føroya

ávikavist Menningargrunn Idnaðarins
a) Føroya Idnaðargrunn:
Mótvirði av 35 mió. norskum krónur sum lán í fremmandum gjaldoyra sambært fylgjandi
DEM 6.940.000,-
CHF 2.785.000,-
NLG 3.805.000,-

b) Menningargrunnur Idnaðarins:
Mótvirðið av 15 mió. norskum krónum sum lán í fremmandum gjaldoyra sambært fylgjandi
DEM 2.975.000,-
CHF 1.195.000,-
NLG 1.630.000,-

§ 3. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Idnaðargrunnur respektive Menningargrunnur Idnaðarins:
a) Føroya Idnaðargrunnur:
Modværdien af 35 mill. norske kroner i fremmed valuta i overensstemmelse med følgende
DEM 6.940.000,-
CHF 2.785.000,-
NLG 3.805.000,-

b) Menningargrunnur Idnaðarins:
Modværdien af 15 mill. norske kroner i fremmed valuta i overensstemmelse med følgende
DEM 2.975.000,-
CHF 1.195.000,-
NLG 1.630.000,-

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 16. mars við loyvi um frávik frá tíðarfreistini. §§ 1 og 2 samtyktar við 29-0, § 3 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 17. mars. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1212-14-1 Lóg nr. 30 frá 17. mars 1982.

---

114. Broyting í skattalógini, persónsfrádrátturin, rentufrádrátturin, skattatalvan v.m.

Ár 1982, fríggjadagin 26. februar legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 26, 1. stk., 1. punktum verður »1.000 kr.« broytt til »1.200 kr.«.

2) § 26, 3. stk., 4. stk. og 5. stk. verður orðað soleiðis:

»*3. stk.* Fyri leysar persónar verður persónsfrádrátturin 4.000 kr., tá skattskylduga inntøkan ikki er yvir kr. 100.000,00. Har inntøkan er hægri verður frádrátturin lækkaður við 1% av muninum millum kr. 100.000,00 og inntøkuna. Fyri hjún, har konan er sett í skatt sambært § 17,2. stk. verður frádrátturin fyri hvørt av hjúnunum kr. 3.250,00, lækkað við 1% av skattskyldugu inntøkuni. Har bert annar hjúnarfelagin hevur skattskylduga inntøku, er frádrátturin kr. 6.500,00, tá skattskylduga inntøkan er yvir kr. 100.000,00. Har inntøkan er hægri, verður frádrátturin lækkaður við 1% av muninum millum kr. 100.000,00 og inntøkuna.

4. stk. Fyri leysar persónar yvir 67 ár og leysar persónar, sum fáa avlamis-, einkju- ella fólkapensión verður persónsfrádrátturin kr. 6.500,00 tá skattskylduga inntøkan ikki er yvir kr. 100.000,00. Har inntøkan er hægri, verður frádrátturin

ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ *1.* I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 26, stk. 1, 1. punktum ændres »1.000 kr.« til »1.200 kr.«.

2) § 26, stk. 3, stk. 4 og stk. 5 affattes således:

»*Stk. 3.* For enlige personer udgør personfradraget kr. 4.000,00, hvis den skattepligtige indtægt ikke overstiger kr. 100.000,00. Overstiger den skattepligtige indtægt dette beløb reduceres fradraget med 1% af forskellen mellem kr. 100.000,00 og indtægten. For ægtefæller, hvor hustruen er ansat særskilt til skat iflg. § 17, stk. 2, er fradraget for hver af ægtefællerne kr. 3.250,00, reduceret med 1% af den skattepligtige indtægt. Hvis kun den ene af ægtefællerne har skattepligtig indtægt, er fradraget kr. 6.500,00, hvis den skattepligtige indtægt ikke overstiger kr. 100.000,00. Overstiger den skattepligtige indtægt dette beløb, reduceres fradraget med 1% af forskellen mellem kr. 100.000,00 og indtægten.

Stk. 4. For enlige personer over 67 år samt enlige personer, som oppebærer invalide-, enke- eller folkepension, er personfradraget kr. 6.500,00 hvis den skattepligtige indtægt ikke overstiger kr. 100.000,00. Overstiger den skattepligtige ind-

lækkaður við 1% av muninum millmillum kr. 100.000,- og inntøkuna. Fyri hjún, har konan er sett í skatt sambært § 17, 2. stk. og annað teirra ella bæði eru yvir 67 ár ella fáa avlønis og/ella fólkapensión, verður persónsfrádrátturin fyri fyri hvørt av hjúnunum kr. 3.700,- tá skattskylduga inntøkan ikki er yvir kr. 100.000,00. Har inntøkan er hægri verður frádrátturin lækkaður við 1% av muninum millum kr. 100.000,00 og inntøkuna.

5. stk. Har hjúnafelagar eru skattskattaðir hvør sær sambært § 17, 2. stk. og annar teirra ikki fær nýtt sin persónsfrádrátt til fulnar, skal restin verða drigin frá í landsskattinum hjá hinum hjúnafelaganum, smb. § 34, 2. og 3. stk.«

3) Í § 26 verður sum nýtt 7. og 8. stk. sett:

»*7. stk.* Fyri keypssáttmálar stovnaðir aftaná 1. apríl 1982 er hægst loyvdi rentufrádráttur í einum almanakkaári diskontoin pr. 31. december árið fyri + 10% pro anno. Tann parturin av rentuni í einum ári, sum liggur omanfyri diskontoina pr. 31. december + 10% kann ikki verða tikin við í samlaðu rentuupphæddini sambært 6. stk. Fyri sáttmálar, stovnaðir í einum ávísum ári, er rentan pr. 31. december árið fyri galdandi fyri alt sáttmálaskeiðið. Keypssáttmálar, gjørdir um keyp av rakstrargøgn-

tægt dette beløb, reduceres fradraget med 1% af forskellen mellem kr. 100.000,00 og indtægten. For ægtefæller, hvor hustruen er ansat særskilt til skat ifølge § 17, stk. 2, og den ene eller begge er over 67 år eller oppebærer invalide- og/eller folkepension, er personfradraget for hver af ægtefællerne kr. 3.700,00 hvis den skattepligtige indtægt ikke overstiger kr. 100.00,00. Overstiger den skattepligtige indtægt dette beløb, reduceres fradraget med 1% af forskellen mellem kr. 100.000,00 og indtægten.

Stk. 5. Hvis ægtefæller er ansat til skat hver for sig efter § 17, stk. 2, og og den ene ikke fuldt ud kan udnytte sit personfradrag, kan resten fradrages i den anden ægtefælles landsskat, jfr. § 34, stk. 2 og 3.«

3) I § 26 indsættes som følgende nyt stk. 7 og stk. 8:

»*Stk. 7.* I købeaftaler indgået efter 1. april 1982 er det højst tilladte rentefradrag i et almanakår diskontoen pr. 31. december året i forvejen + 10% pro anno. Den del af renten i et år, der er over diskontoen pr. 31. december + 10% kan ikke medtages i det samlede rentebeløb i henhold til stk. 6. For aftaler, indgået i et bestemt år, er renten pr. 31. december året i forvejen gældende for hele aftaleperioden. Købeaftaler, indgået om driftsmidler, der kan afskrives i henhold til kap. 2 i afskrivningsloven, kommer også under denne bestemmelse for

um, sum kunnu avskrivast sambært 2. kap. í avskrivingarlógini, koma eisini undir hesa reglu fyri tann partin, ið ikki verður nýttur vinnuliga.

8. stk. Líkningarráð Føroya kunngerð í januar mánaði rentuna galdandi fyri álmanakkaárið, tó fyrstu ferð í apríl 1982, sum diskontoin pr. 31. desember 1981 + 10% galdandi fyri 1982, og ásetir tær nærri reglur fyri tað prógvtilfar, sum skal fyriliggja fyri at loyva frádrátt eftir 7. stk.«

den del, der ikke anvendes erhvervsmæssigt.

Stk. 8. Færøernes Ligningsråd bekendtgør i januar måned renten, der er gældende for almanakåret, første gang dog i april 1982, som diskonto en pr. 31. december 1981 + 10% gældende for 1982, og fastsætter de nærmere bestemmelser for det bevismateriale, der skal foreligge for at kunne tillade fradrag i henhold til stk. 7.«

4) § 27, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»*1. stk.* Teir í § 14 nevndu óavmarkaðu skattskyldugu og teir í § 15, 1. stk. nevndu avmarkað skattskyldugu persónar lata skatt til landskassan soleiðis:

4) § 27, stk. 1, affattes således:

»*Stk. 1.* De i § 14 omhandlede ubegrænset skattepligtige samt de i § 15, stk. 1 omhandlede begrænset skattepligtige svarer skat til landskassen således:

Er innteikan minni enn 25.000 kr. verður latið 20%

Er inn-teikan kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av kr.	og av restini %
25.000	45.000	5.000	25.000	26
45.000	200.000	10.200	45.000	35
200.000	250.000	64.450	200.000	42,5
250.000	300.000	85.700	250.000	44,5
yvir 250.000	300.000	107.950	300.000	46

Er indtægten mindre end kr. 25.000 erlægges 20%

Er ind-tægten kr.	men mindre end kr.	erlægg-es kr.	af kr.	% af resten
25.000	45.000	5.000	25.000	26
45.000	200.000	10.200	45.000	35
200.000	250.000	64.450	200.000	42,5
250.000	300.000	85.700	250.000	44,5
over 250.000	300.000	107.950	300.000	46

5) Sum nýggj § 93 A verður sett:

«Landsstýrinum verður heimilað at sleppa persónum undan at taka við í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni samsýning fyri luttøku í millumlanda menningararbeiði, tá hetta er fíggjað av donskum statspeningi ella Føroya landsstýri.«

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1982/83.

5) Som ny § 93 A indsættes:

»Landsstyret bemyndiges til at fritage personer for ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst at medregne vederlag for deltagelse i internationalt udviklingsarbejde, når disse er finansieret af danske statsmidler eller Færøernes landsstyre.«

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1982/83.

Viðmerkingar:

Tá ið landsstýrið seinasta heyst legði uppskot fyri tingið um hækkan av ávisum tollgjøldum varð sagt, at landsstýrið kannaði møguleikarnar fyri partvísa kompensatión fyri hesar avgjaldshækkingar.

Hjálagda uppskot til broytingar í skattalógini er eitt úrslit av hesum arbeiði. Talan er um eina hækkan av barnafrádráttinum og ein generellan lætta av skattinum á láginntøkum.

Annars verður sum nakað nýtt í skattalógini mælt til at seta mark fyri, hvussu stóra rentu loyvt skal vera at draga frá á sjálvuppgávuni.

Eisini verður mælt til at veita teimum skattasømdir, sum sjálvboðin eru send í menningarfond, liggjað av donskum statspeningi og/ella landspeningi.

Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar.

Til § 26, 1. stk.

Skotið verður upp at hækka barnafrádráttin í útroknaða landsskattinum úr núverandi 1.000 kr. til 1.200 kr. Mett verður, at hetta kemur at føra við sær umleið 2,6 mill. kr. í minni inntøku hjá landskassanum fyri komandi fíggjarár.

Til § 26, 3., 4. og 5. stk. og § 27, 1. stk.

Broytingarnar í teim persónsfrádráttum, sum hvør persónur undir fullari skattskyldu fær frádrigið í útrokningini av skattinum, mugu siggjast sum ein heild saman við teim uppskotnu broytingunum í landsskattatalvuni. Endamálið við hesum broytingum er:

1) At veita teim lægru inntøkunum ein skattalætta, sum samanlagt verður mettur til umleið 12 mill. kr. roknað eftir inntøkubýtinum við seinast undanfarnu likning. Ávirkanin á tann álíknaða skattin hjá tí einstaka skattgjaldaranum verður lýst nærri í hjáløgdu 5 talvum, sum fyri ávísar inntøkur vísir broytingina í landsskattinum eftir fyriliggjandi lógaruppskoti fyri ymsar bólkar av skattgjaldarum.
2) At yvirflyta ein part av prógressiónini frá persónsfrádráttinum til sjálva landsskattatalvuna, soleiðis at tað stigvíst verður miðað móti at fáa fastar persónsfrádráttir.

Til § 26, 7. og 8. stk.

Fyri at fáa frádrátt fyri rentu av keypssáttmálum verður treytað, at skattamyndugleikunum verður latið prógv fyri sáttmálakeypið, sum vísir upphædd, afturgjaldstíð, tal av gjøldum, áljóðandi rentu, samlaða rentuupphædd og býti av hesi yvir árini.

Tá ið keypssáttmálar vanliga eru roknaðir við eini mánaðarrentu, má umrokning til effektiva rentu pro anno gerast av diskonteringsfelagnum (seljaranum), og um henda er hægri enn hægst loyvda rentuprosent í inniverandi ári (sum lýst í kunngerð

ráðsins í januar á hvørjum ári), má á uppgerðarskjalinum, sum vísir samlaða rentuupphædd og býti av henni, umframt týðuliga tilskilast, hvat tann frádráttarloyvdi parturin av hesum upphæddum er.

Renta av sáttmálum, sum ikki uppfylla hesar treytir, verður ikki loyvd frádrigin. Sum prógv fyri, at sáttmálin er goldin eftir upprunatreytunum, verður at lata skattavaldinum eitt avrit av tí endaliga uppgerðarbrævinum frá diskonteringsfelagnum, tá sáttmálin verður avlýstur.

Er sáttmáli uppgjørdur áðrenn tíðina, verður sostatt at lata inn uppgerðarbræv, sum vísir ta afturførdu rentuupphæddina.

Verður hetta ikki gjørt, verða tær frádrignu renturnar í árunum frammanundan strikaðar.

Morarentur v.m. av hesum sáttmálum verða ikki loyvdar frádrignar.

Til § 93 A.

Við tekstviðmerking á árligu donsku fíggjarlógunum er skattaráðharrin heimilaður at sleppa persónum, ið sum liður í Danmarkar luttøku í millumlanda menningararbeiði — fíggjað við donskum statspeningi — arbeiðir í hesum londum, undan í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni at rokna samsýningina fyri tílík arbeiði.

Undir skattafrítøkuna koma millum annað tey, sum sjálvboðin eru send av Danida til menningarlond.

Uppskotið hevur til endamáls, at eisini føroyingar, ið verða sendir av nevnda stovni kunnu koma undir somu skattafrítøku á sama hátt sum danir, eisini um ferðin verður fíggjað við landspeningi.

Sí skjal 13

1. viðgerð 9. mars. Málið varð beint í skattanevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fyri tingið av landsstýrinum tann 26. februar 1982 og undir 1. viðgerð 9. mars beint í skattanevndina.

Undir viðgerðini komu ymiskir spurningar fram, sum tingmenn ynsktu betri lýstar.

Aftaná at málið hevur verið til 1. viðgerð, er til skattanevndina komið eitt uppískoyti viðvíkjandi § 33, 2. stk., við tað at reglan um at avmarka renttufrádráttin í landsskattinum sambært § 26, 7. og 8. stk. av misgáu er útigloymd í renttufrádráttinum í kommunuskattinum.

Nevndin hevur kannað hesar spurningar og hevur á fundi tann 24. mars viðgjørt málið í síni heild og teir ivaspurningar, sum komu fram undir 1. viðgerð, og hevur

nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó tekur Jógvan Sundstein støðu í tinginum til rentufrádráttin, jbr. § 26, 7. og 8. stk. Meirilutin setur í samband við omanfyri nevnda uppiskoyti til § 26, 7. og 8. stk. fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 3, 2. stk. verður aftan á fyrsta punktum sett:

5) »Fyri rentu av keypssáttmálum er reglan í § 26, 7. og 8. stk. eisini galdandi her.«

I § 33, stk. 2 tilføjes første punktum:

5) »For renter af købekontrakter er reglerne i § 26, 7. og 8. stk. også gældende her.«

Núverandi punkt 5) verður punkt 6).

Minnilutin (Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen) metir, at hækkingin í barnafrádráttinum í landsskattinum úr 1.000 kr. upp í 1.200. er alt ov lítil, tá hugsað verður um, at hækkingin bæði er ein náttúrlig javnføring av barnafrádráttinum og eitt viðurlag fyri tær hækkingar í innflutningsgjøldunum, sum samgonguflokkarnir framdu í september 1981. Minnilutin heldur, at barnafrádrátturin í landsskattinum eigur at hækkast úr 1.000 kr. upp í 1.500 kr., og setir minnilutin fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 26, 1. stk., 1. punktum verður »1.000 kr.« broytt til »1.500 kr.«.

I § 26, stk. 1, 1. punktum ændres »1.000 kr.« til »1.500 kr.«.

Minnilutin tekur undir við teim broytingum í persónsfrádráttinum og skattatalvuni, sum eru umfatað̃ar av uppskotinum frá landsstýrinum, men ger minnilutin vart við, at hækkingarnar hjá teimum hægru inntøkunum ikki eru reellar, tá hesar kortini koma undir hámarkið 50%.

Í uppskotinum mælir landsstýrið til, at frádrátturin av rentum, sum eru goldnar fyri keypssáttmálar, er avmarkaður soleiðis, at størst loyvdi frádrátturin verður diskontoin + 10%. Minnilutin kann møguliga taka undir við hesum, men vil í fyrstu syftu mæla til, at landsstýrið leggur lógaruppskot fyri tingið, sum avmarkar rentuupphæddina av keypssáttmálum til t.d. diskontoina + 5%. Út frá hesum setir minnilutin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt í tingsetuni 1982 at leggja lógaruppskot fyri løgtingið, sum hevur til endamáls at avmarka rentuupphæddina á keypssáttmátum til t.d. diskontoina + 5%.

Viðvikjandi seinastu broytingini í uppskoti landsstýrisins, ið umfatar persónar, sum luttaka í millumlanda menningararbeiði, tekur minnilutin støðu í tingsalinum.

30. mars løgdu tingmenninir Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen soljóðandi

UPPÍSKOYTISÁLIT

Umframt tær broytingar, sum eru skotnar upp í sjálvum álitinum, setur minnilutin (Finnbogi Isaksen og Vilhelm Johannesen) fram soljóðandi broytingaruppskot:

Í § 27, 3. stk. verður »50%« broytt til »55%«.

I § 27, stk. 3 ændres »50%« til »55%«.

2. viðgerð 31. mars. Atkvøðugreiðsla á seinni fundi sama dag. § 1, pkt. 1 og 2 samtykt við 28-0, pkt. 3 fall við 12-0, pkt. 4 samtykt við 29-0, pkt. 5 fall við 12-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 1. apríl. Uppskotið varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 430-12-36 Lóg nr. 44 frá 16. april 1982.

---

115. Fyrispurningur til løgmann.

Ár 1982, fríggjadagin 26. februar varð boðað frá fyrispurninginum frá Finnboga Isaksen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

1. Er tað ein avtala millum Føroyar og Felagsmarknaðin, at umboðsmenn fyri EEC-lond (í hesum føri Írland) koma til Føroya at kanna, um tær upplýsingar um

laksafiskiskap, sum føroyingar geva, eru beinar?
2. Hava føroyingar sambært hesa avtalu rætt til at fara til EEC-lond t.d. Írland at kanna, um teirra uppgevingar um laksaveiðu eru beinar?
3. Um so er, at spurningur 2 verður svaraður játtandi, er tað so ætlan landsstýrisins at senda fólk til Írlands at kanna eftir, um laksaveiða ira er í samsvari við reglur, sum settar eru føroyingum í sáttmálanum við EEC?

Viðmerkingar:

Í sáttmálanum við felagsmarknaðin var javnvágin so mikið vánalig, at EEC fekk nógv meira í sín part undan Føroyum, enn føroyingar fingu í EEC-sjógvi.

Harumframt noyddust føroyingar at góðkenna, at skerja sína veiðu í egnum sjógvi til stóran skaða fyri føroyskar laksaveiðumenn.

Roknast má við, at tær upplýsingar, sum føroyskir myndugleikar geva — eisini um laksamál — eru sannar, og tí er eitt slíkt útlendskt eftirlit ikki bert óneyðugt, men hartil eyðmýkjandi fyri okkum sum fólk.

8. mars varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

22. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, hevur sett mær hesar fyrispurningar:

1. Er tað ein avtala millum Føroyar og Felagsmarknaðin, at umboðsmenn fyri EEC-lond (í hesum føri Írland) koma til Føroya at kanna, um tær upplýsingar um laksafiskiskap, sum føroyingar geva, eru beinar?
2. Hava føroyingar sambært hesa avtalu rætt til at fara til EEC-lond t.d. Írland at kanna, um teirra uppgevingar um laksaveiðu eru beinar?
3. Um so er, at spurningur 2 verður svaraður játtandi, er tað so ætlan landsstýrisins at senda fólk til Írlands at kanna eftir, um laksaveiða ira er í samsvari við reglur, sum settar eru føroyingum í sáttmálanum við EEC.

Til hetta er at siga:

Viðvíkjandi spurningi 1:

Tann avtala, ið gjørd er millum Føroyar og Felagsmarknaðin, har ímillum eisini orðingin um laks, varð løgd fyri tingið í tingmáli nr. 102/1981 (vetrartingsetan): Skipan ímillum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Sum teir, ið hava lisið tingmálið, vita, inniheldur avtalan einki um nakað eftirlit.

Spurningurin kann sostatt svarast noktandi.

Viðvíkjandi spurningi 2:
Sum tað framgongur av svarinum uppá spurning 1, er eingin slík avtala gjørd.

Viðvíkjandi spurningi 3:
Víst verður til, at eisini spurningur 2 varð svaraður noktandi.

---

116. Praktikklæra á hernaðarligum stovnum.

Ár 1982, friggjadagin 26. februar legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinumígjøgnum landsskúlaráðið og landskúlafyrisitingina at syrgja fyri, at føroyskir skúlanæmingar ikki verða sendir í praktikklæru hjá útlendskum hervaldi í Føroyum.

Viðmerkingar:
Komið er fram, at næmingar í føroyskum skúlum, tá ið teir velja sær praktikkpláss í skúlatíðini, eisini hava verið á herstøðini í Mjørkadali, á Marinustøðini og umborð á donskum krigsskipum.

Føroya Løgting hevur í 1961 og 1970 mótmælt útlendskari hernaðarligari uppílegging í Føroyum og kravt, at Føroyar verða hildnar uttan fyri allar hernaðarligar samgongur og at krígsútgerð ikki verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.

Út frá hesum samtyktum løgtingsins má tað haldast at vera heilt út av lagi rangvørgt, at føroyskir skúlanæmingar verða sendir til uppvenjingar á hernaðarligum stovnum.

Harumframt eigur at verða viðmerkt, at tað er andstyggiligt og beinleiðis í stríð við endamálsgreinina í løgtingslóg um fólkaskúlan, at senda næmingar til uppvenjing í krígstænastu.

1. viðgerð 10. mars. Málið varð beint í skúlanevndina.

27. apríl boðaði formaðurin frá, at málið varð aftur tikið.

117. Fyrispurningur til løgmann.

Ár 1982, friggjadagin 26. februar varð boðað frá fyrispurninginum frá Jørgen Thomsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Hvørja ætlan hevur landsstýrið við alginatvirkinum á Strondum?
2. Ætlar landsstýrið einki at gera fyri at fyribyrgja, at tekniska útgerðin á virkinum tekur skaða?
3. Hevur landsstýrið nakra ætlan um at fara undir nýggjar royndir við at skera tara og framleiða alginat?

Viðmerkingar:

Fyri umleið einum ári síðani varð alginatvirkið á Strondum afturlatið, eftir at virkið hevði tikið ímóti og framleitt bert í helt stutta tíð. Tá varð sagt, at landsstýrið skuldi kanna rakstrarmøguleikarnar hjá virkinum, men seinni hava vit frætt, at virkið ikki verður latið upp av nýggjum. Í løtuni liggur virkið uttan el og hita, og harvið er stórur vandi fyri, at tann tekniska útgerðin á virkinum tekur skaða.

Orsøkin til, at virkið beinan vegin kom í figgjarligar trupulleikar var m.a. tann, at taratrolarin, ið virkið læt byggja, og sum stóð virkinum í 7.-8.000.000 kr., so at siga onga figging fekk. Menningargrunnurin og idnaðargrunnurin, sum annars luttóku í figgingini av virkinum, mettu ikki, at tað lá innanfyri teirra virkisøki, at veita figging til ein bát. Løgtingsins figgjarnevnd metti ikki, at taratrolarin kundi fáa stuðulslán eftir lógini um endurnýgging av fiskiskipaflotanum, tá talan ikki var um eitt fiskiskip av tí traditionella slagnum.

Eisini kann verða nevnt, at alginatúrtøkan úr taranum ta tíðina alginatvirkið var í gongd, var rættiliga lítil. Úrtøkan var einans 2%. Í øðrum londum rokna menn vanliga við eini úrtøku uppá 4%. Á alginatvirkinum á Strondum mettu menn, at orsøkin til, at úrtøkan var so lítil, var tann, at føroyski tarin ikki hevur verið skorin regluliga. Síðani hava royndir sýnt, at har tari er skorin fyri einum ári síðani, er nýggjur tari vaksin aftur, ið inniheldur almikið av alginati. Hesir tarasteyrar vóru ein metur høgir eftir einum ári. Somuleiðis kann verða nevnt, at keypararnir av alginati frá virkinum á Strondum hava verið sera væl nøgdir við framleiðsluna.

Tað er prógvað, at vit hava nóg mikið av góðum ráevni til alginatframleiðslu, at vit eisini hava eitt nýmótans virki til endamálið, og at vit hava fólk við kunnleika til veiðu og tilvirking á hesum øki. Ein má koma til ta niðurstøðu, at royndirnar við at skera tara og framleiða alginat við einum góðum figgjarligum úrslíti, ikki eru gjørdar í nóg stóran mun, og at vit tí eiga at fara undir hesar royndir av nýggjum.

Út frá hesum loyvi eg mær at seta frammanfyri standandi fyrispurning fram.

8. mars varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at løgmaður skuldi svara fyrispurninginum.

22. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Jørgen Thomsen, løgtingsmaður hevur sett hesar fyrispurningar:

1. Hvørja ætlan hevur landsstýrið við alginatvirkinum á Strondum.
2. Ætlar landsstýrið einki at gera fyri at fyribyrgja, at tekniska útgerðin á virkinum tekur skaða.
3. Hevur landsstýrið nakra ætlan um at fara undir nýggjar royndir við at skera tara og framleiða alginat?

Viðvíkjandi 1. spurningi

P/F Føroya Alginatvirki, Strendur, boðaði alment frá í skrivi dagfest 25. mars 1981, at virkið hevði steðgað framleiðsluni av alginat, og at virkið varð stongt.

Hetta stig bleiv tikið, hóast landsstýrið mælti til, at virkið var hildið í gongd, meðan viðari kanningar fóru fram.

Landsstýrið hevur alla tíðina havt samband bæði við eigararnar av virkinum og við Menningargrunnin og Ídnaðargrunnin. Eftir áheitan frá og í samráð við landsstýrið eru kanningar farnar fram bæði av útlendingum og av føroyingum, um møguleikar vóru fyri at halda áfram við framleiðsluni av alginati.

Allar kanningar higartil vísa, at framleiðsla av alginat ikki ber seg.

Eftir áheitan frá landsstýrinum hevur Menningargrunnurin syrgt fyri, at tekniska útgerðin á virkinum var hildin við líka til 31. desember 1981.

Kanningar og royndir viðvíkjandi Alginatvirkinum á Strondum eru ikki lidnar enn. Menningargrunnurin stílar fyri kanningum og royndum viðvíkjandi turking av svartkjafti, framleiðslu av alginat og aðrari framleiðslu úr tara.

Viðvíkjandi 2. spurningi

Vist verður til svar uppá 1. spurning.

Viðvíkjandi 3. spurningi.

Sum nevnt í svarinum uppá 1. spurning, so hevur landsstýrið sjálvt ikki gjørt nakrar royndir at skera tara og framleiða alginat, og ongar ætlanir fyriliggja um tílíkt.

Hinvegin hevur landsstýrið mælt til, at royndirnar verða gjørdar. Vísa úrslitini av kanningum og royndum, at framleiðsla úr tara ella onnur framleiðsla á alginatvirkinum á Strondum hevur møguleikar fyri at bera seg, so vil landsstýrið gera alt, sum gerast kann, fyri at stuðla verandi eigarum ella øðrum í hesum virkseminum.

118. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 26. februar boðaði formaðurin frá fyrispurninginum frá Jørgen Thomsen, løgtingsmanni, soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Hví verða landsins skip ikki umvæld og viðgjørd her á landi, tá ið allir møguleikar sýnast vera fyri hesum, og tá arbeiðsloysi eisini er millum handverkarar og arbeiðsmenn?

Hevur landsstýrið í samband við dokkseting av Teistanum kannað møguleikan fyri at fáa hetta gjørt í Føroyum?

Viðmerkingar:

Tað er eyðsýnt, at arbeiðsloysið ger meira og meira vart við seg her á landi. Hetta ger seg eisini galdandi á skipasmiðjunum. Hetta kemst ivaleyst av at fiskiskipaflotin hevur havt tað ógvuliga trongligt peningaliga í eitt langt áramál.

Á skipasmiðjunum arbeiða fleiri hundrað fólk og fáa sína úrtøku har.

Tað má tí haldast, at landsstýrið skuldi havt áhuga fyri, at øll arbeiði, ið viðvíkja landsins skipum, verða gjørd her á landi.

Um dagarnar bar útvarpið tey tíðindi, at strandfaraskipið Teistin skal til Danmarkar og har fara í dokk.

Hetta arbeiðið og mong onnur kunnu vit væl gera her á landi. Vit hava framt stórar íløgur í skipasmiðjur og í eina turrdokk, sum er før fyri at dokkseta eitt skip, sum t.d. Teistan.

Vit gera ov nógv av at lata aðrar fara við tí peningi, ið annars kundi verið í landinum, til gagns fyri vinnuvirki og arbeiðsfólk her heima.

Út frá hesum loyvi eg mær at seta frammanfyri standandi fyrispurning fram.

8. mars varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

16. mars svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í fyrispurninginum verður spurt, hvi landsins skip ikki verða umvæld og viðgjørd her á landi, og um landsstýrið hevur kannað møguleikan fyri at dokkseta »Teistan« í Føroyum.

Til fyrra partin av fyrispurninginum er at siga, at tað í næstan øllum førum verða nýttar skipasmiðjur og aðrar smiðjur í Føroyum til at umvæla og viðgera skipini hjá landinum.

Til spurningin um landsstýrið hevur kannað møguleikan fyri at fáa »Teistan« dokksettan í Føroyum kann upplýsast, at tað er kannað.

Í fyrraárið var »Smyril« í Frederikshavn og fekk somu viðgerð, sum »Teistin« fær nú.

Henda viðgerð krevur eina sandblásing av skipsbotninum, sum ikki kann gerast í Føroyum. Harumframt verður botnurin viðgjørdur við sjálvpolerandi máling.

»Smyril« var í dokk á Skála í fjør til aksilsýn. Tá varð botnurin eisini kannaður, og vísti tað seg, at við smávegis ábótum kundi »Smyril« halda fram í 2 ár aftrat uttan at verða dokksettur.

Soleiðis er hetta ein stórur fyrimunur, við tað at skipið ikki nýtist at verða dokksett hvørt ár, men í staðin annað ella triðja hvørt ár. Tí verður hetta gjørt uttanlands nú, meðan hann kortini er har í sigling.

F.L.j.nr. 1800-48-1

---

119. Veðhald fyri láni til Nordafar A/S

Ár 1982, fríggjadagin 26. februar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til NordafarA/S.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri einum rakstrarláni upp til 3 milj. kr. til Nordafar A/S.

lagtingslov om garanti for lån til Nordafar A/S.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et driftslån op til 3 mill. kr. til Nordafar A/S.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nordafar A/S fekk í 1981 eitt lán við landskassaveðhaldi, soleiðis at støðin kundi vera opin eisini í 1981. Ætlanin var at hava tingingar við grønlendska landsstýrið í heyst, men tá Grønland í februar í ár skuldi hava fólkaatkvøðu um limaskapin í E.F. bliva hesar samráðingar ikki tiknar upp.

Nordafar A/S søkir nú landsstýrið um veðhald fyri einum rakstrarláni upp til 3 mill. kr., um virksemið í Føroyingahavnini skal halda fram.

Nevndin í Nordafar A/S ber ótta fyri at árið 1982 eisini fer at geva hall, tá tilgongdin av rávørum verður ov lítil.

Nevndin í felagnum upplýsir, at arbeitt verður við spurninginum um at økja tilgongdina til virkið.

Eins og undanfarin ár, og serliga nú Grønland tingast um at fara úr EF, heldur landsstýrið tað vera rætt ikki at gevast við Nordafar A/S, tá fortreytirnar fyri sam vinnu millum Grønland og Føroyar kunnu broytast.

Landsstyrið leggur tí uppskot fyri tingið um at landskassin veðheldur fyri einum rakstrarláni upp til 3 mill. kr.

8. mars varð frá landsstýrinum framlagt soljóðandi

NOTAT

viðv.

løgtingsmáli nr. 119/1981: Veðhald fyri láni til Nordafar A/S.

Grønlandsfelagið hevur ein partapening uppá kr. 1.430.000,00. Herav eigur

Landskassin	kr.	550.000,00
Fiskasølan	kr.	550.000,00
Fiskimannafelagið	kr.	100.000,00
Skiparafelagið	kr.	100.000,00
Reiðarafelagið	kr.	130.000,00
	kr.	1.430.000,00

Nordafar hevur ein partapening uppá kr. 2.000.000,00, sum Grønlandsfelagið eigur.

Við lóg nr. 11 frá 14. apríl 1975 veðhelt landskassin fyri einum láni uppá 6 milj. kr. til Grønlandsfelagið til keyp av partapeningunum hjá A/S Udrustning í Nordafar, til rindan av kreditorum hjá A/S Nordafar og til rakstrarpening hjá hesum felag. Hetta veðhaldið varð effektivt, og skyldar Grønlandsfelagið nú gjaldstovuni kr. 8.216.316,00, her verður ikki tilskrivað renta.

Harumframt veðheldur landskassin sbrt. løgtingslóg nr. 78 frá 26. oktober 1978 fyri einum rakstrarláni til Nordafar uppá kr. 2.000.000,00. Við løgtingslóg nr. 43 frá 31. mai 1979 veðheldur landskassin fyri 2.000.000,00 kr. og við løgtingslóg nr. 42 frá 20. mai 1981 fyri 3.000.000,00 kr. bæði rakstrarlán til Nordafar.

Hjálagt fyribilsroknskapur.

NORDAFAR as

Fyribils yvirlit yvir rakstur
og figgjarstøðu pr. 31/12-81.

Fyribils uppgerð yvir rakstur 1981

Brutto vinningur:		
Frá deildunum		2.026.597
Saltfiskur		3.471.462
Laksur/kalvi		2.574.509
Viðgerð fyri aðrar		2.068.072
		10.140.642
Útreiðslur:		
Ymiskar felagsútreiðslur	204.330	
Viðlíkahald	744.480	
Kraftstøðin	1.034.537	
Lønir	5.342.891	
Kostpengar	814.310	
Ferðaútreiðslur	409.724	
Tryggingar	176.748	8.727.022
		1.413.620
Skrivstovur		666.387
		747.233
Laksabonus		997.000
		249.766
Tap uppá m/tr AVOQ (ikki endaliga uppgjørt)		600.000
Hall áðrenn rentur		849.766
Rentur		1.807.060
Hall uttan avskriving		2.656.827

Aktiv

Kassa- og bankapeningur		273.398
Tilgóðar fyri fisk		11.296.044
Skuldarar		946.177
Ivasamir skuldarar		102.680
Goymslur		4.367.522
Sáttmáli uppá maskinur	855.000	
— tap uppá maskinur	600.000	255.000
Maskinur og bygningar		4.224.400
Íløgur í maskinur v.m. í 1981		330.413
Deposita/skuldbinding v.m.		65.000
Tiltaksgrunnur í Føroya Fiskasølu		1.069.261
Partabræv		1.000
		22.930.899
Undirskotssaldo		6.102.695
Hall samb. rakstraryvirlit		2.656.827
		31.690.422

Passivir

Kassakredittur:			
Bikuben	3.000.000		
Føroya Banki	3.547.942		
Føroya Banki	621.200		
Sjóvinnubankin	3.514.522		
Sjóvinnubankin	621.528		11.305.194
Ognarar			8.550.583
Laksabonus			997.000
Grønlandsskattur/fritíðarløn			882.342
Ymist avsett			209.255
Avsett móti tapi			390.000
Niðurskriving av goymslum			517.000
Prioritetslán — Bikuben			480.000
Maskinlán Føroya Fiskasøla			571.000
Millumrokning við Grønlandsfelagið			5.288.046
			29.190.422
Partapeningur	2.000.000		
Lógásettur tiltaksgrunnur	500.000		2.500.000
			31.690.422

Yvirlit yvir tøkasta pening
og ógoldna skuld.

Áogn fyri fisk		11.296.044
Fallið til gjaldingar:		
Avrokning AVOQ/Bikuben	2.374.247	
Avrokning m/s Kangeq	3.839.583	
Avrokning m/s Seis	308.450	6.522.281
		4.773.763
Laksabonus	997.000	
Grønlandsskattur v.m.	882.342	1.879.342
		2.894.420
Bikuben/tap uppá maskinur		600.000
		2.294.420
Saltsølan	1.126.449	
K/F Vørðan	464.747	
J.K. Joensen & Sonur	224.673	
Vónin	112.213	
Ymist	69.027	
Niðurskriving av kassakreditti	— 200.000	2.197.122
		97.308

Viðmerkingar til fyribilsroknskapin.

Hesin roknskapur er ikki granskoðaður og endaliga bókingartilfarið er ikki alt viðkomið enn.

Endalig uppteljing og vurdering av goymslunum er ikki gjørd.

Kreditvirðið av skuldarum er ikki kritiskt uppgjørt.

Roknskaparligar periodureguleringar og avskrivingar eru ikki gjørdar.

Tapið uppá m/tr AVOQ í sambond við gjaldsstoðg er ikki endaliga uppgjørt, men í hesari uppstilling sett til kr. 600.000, .

1. viðgerð 10. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 26. februar 1982 og undir 1. viðgerð 10. mars beint í figgjarnevndina.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Sami meiriluti viðmerkir, at øll støðan og ognarviðurskiftini viðvikjandi Nordafar A/S eigur at verða uppgjørd

komandi ár og vísir meirilutin til, hvat landskassin hevur veðhildið fyri, og hvat landskassin sum borgsmaður hevur rindað. Tá hugsað verður um lutfallið millum, hvat landskassin eigur í partapeningi í Nordafar, og hvat landskassin hevur veðhildið seinastu árini, er neyðugt at ein avleiðing verður tikin og útint í hesum máli.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) viðmerkir, at gjøgnum seinnu árini hevur landsstýrið veðhildið fyri Nordafar A/S fyri umleið 15,2 mió. kr., og verður nú biðið um veðhald fyri 3 mió. kr. aftrat. Partapeningur Føroya Løgtings í Nordafar er 550.000 kr. av einum samlaðum partapeningi uppá 1.430.000 kr. Eingin av hinum partaeigarunum hevur goldið ella veðhildið nakrantíð, eins og tað almenna sum higartil einans hevur havt milliontal í halli og veðhaldi ferð eftir ferð fyri hetta felag. Tí setir minninlutin fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Álagt verður partaeigarunum at tekna nýggjan partapening uppá 3 mió. kr. í Nordafar A/S, og løgtingið gevur Føroya landsstýri loyvi til at hækka sín partapening, lutvíst í mun til tann partapening, landsstýrið frammanundan eigur í Nordafar A/S.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur sítt egna tilmæli.

Felagið Nordafar, hvørs partapening Grønlandsfelagið eigur, hevur higartil fingið landskassaveðhald, sum svarar til 7 mió. kr. Hartil kemur, at ánarin av Nordafar, Grønlandsfelagið, skyldar landskassanum (gjaldstovuni) yvir 8 mió. kr. Ella við øðrum orðum, Grønlandsfelagið og dótturfelag tess, Nordafar, skylda landskassanum tilsamans yvir 15 mió. kr. Landsstýrið skjýtur upp at hækka hesa skuld upp til 18 mió. kr.

Felagið Nordafar, og møguliga eisini Grønlandsfelagið, er insolvent uttan mun til, hvussu tey seta roknskapin upp, við tað at ein møgulig kapitalkonto hevði sæð soleiðis út:

5,6 mió. kr.

Umsóknin varð grundað á fyribils rakstrartøl, og tað var hon merkiligt nokk eisini seinasta ár og møguliga eisini hini árini.

Vanlig praksis í fíggjarnevndini hevur verið, at felóg ella einstaklingur skal framleggja grannskoðaðan roknskap við ognarlista, og at teir ognarar, sum samstundis eru luta- ella partaeigarar, verða tiknir burtur úr passivunum, áðrenn mett hevur verið, um neyðugt er við landskassaveðhaldi. Henda praksis verður ikki fylgd, tá tað snýr seg um p/f Nordafar, hóast ognarar eru fyri tilsamans 8,5 mió. kr.

Av fyribils uppgerð yvir rakstur í 1981 sæst, at felagið hevur havt eina inntøku uppá 6 mió. kr. av sølu av fiski.

Somuleiðis sæst, at felagið eigur 11,2 mió. kr. útistandandi sum ágóði fyri fisk, ella eina upphædd, sum svarar til, at felagið gevur minst 2 ára reinburs, tó uttan rentu, ti roknskapurin visir *onga* rentuinntøku av

kr. 11.296.044 (tilgóðar fyri fisk)
kr. 1.048.857 (skuldarar og ivasamir skuldarar)
kr. 1.069.261 (tiltaksgrunnur í Føroya Fiskasølu)
kr. 13.414.162 (útistandandi uttan rentu)

Haraftur ímóti visir uppgerðin, at felagið hevur 11. mió. kr. í lánum, og hevur goldið 1,8 mió. kr. í rentu.

Hetta, at felagið er insolvent við nærum 6 mió. kr.,

at eigari tess møguliga er insolventur við eini enn større upphædd, og

at fyribilsuppgerð yvir rakstur í 1981 sýnir eitt alt ov stórt fusk (jfr. tær 600 túsund kr. í tapi uppá maskinur, hall bókað sum ogn o.a.m.)

ger, at minnilutin út frá fyriliggjandi upplýsingum ikki kann taka undir við at veðhalda við uppaftur 3 mió. kr.

Og hetta, at felagið onga rentuinntøku hevur av 13 mió. kr. í útistandandi peningi, meðan tað samstundis má gjalda næstan 2 mió. kr. í rentum av eini minni skuld,

ger, at minnilutin setir fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at fyriskipa eini tilbotsgangandi kanning av Nordafar A/S og at leggja dent á at kanna

1) hví so stórur munur er millum rentuinntøkuna (sum er kr. 0,-) og rentu útreiðslurnar (sum eru 1,8 mió. kr.).
2) hvønn fiskurin er seldur ígjøgnum og hvussu gjaldseftirstøða seljarans er so stór, ella gjaldstíðin so long.
3) hvørjir ognararnir eru, og um nakar teirra ella teir undir 2) nevndu seljarar eru partaeigarar í Nordafar AS ella móðurfelagnum p/f Grønlandsfelagið.
4) um útluting av avlopi nakrantíð er farin fram og um hvussu stór ein møgulig útluting hevur verið,
5) og um hvussu stóran ágóðu felagið eigur hjá Føroya Fiskasølu ella feløgum við relatión til hana, og um hesar upphæddir kunnu frígevast til fyrimun fyri Nordafar A/S.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 23-0, § 2 uttan atkvæð

ugreiðslu. Uppskotið til samtyktar frá Ova Mikkelsen fall við 12-0, uppskotið til samtyktar frá Adolf Hansen fall við 16-0.

27. apríl løgdu løgtingsmenninir Erlendur Patursson, Petur Reinert, Hans M. Joensen, Ove Mikkelsen og Karin Kjølbro fram soljóðandi

Broytingaruppskot

UPPSKOT
til
samtyktar

Føroya løgting samtykkir at veita grønlendska landsráðnum føroysku ognirnar í Føroyingahavnini til ognar.

3. viðgerð 28. apríl. Uppskotið til samtyktar frá Erlindi Patursson, Karini Kjølbro, Peturi Reinert, Ova Mikkelsen og H.M. Joensen fall við 7-0 atkvøðum. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 22-3 atkvøðum.

F.L.j.nr.1408-4-3. Lóg nr. 73 frá 21. mai 1982.

---

120. Liðuggerð av vegnum Vág - Fámará.

Ár 1982, týsdagin 9. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at vegurin Vág - Fámará verður liðugt gjørdur í hesum figgjarári, og at upphæddin 300.000 kr. verður sett á figgjarlógina 1982/83.

Viðmerkingar:

Í 1946 læt Føroya Jarðarráð dalin Fámará, sum liggur á vestursíðuni av bygdini Vágur skilja frá prestfestinum, og læt Arna Brattaberg festa Fámará.

Her var tó eingin vegur, hvørki norður í dalin Vágsmegin ella um fjallið og niður í dalin. Sostatt varð alt tilfar til og frá Fámará borið á mans- og hestbaki. Bóndin hevði altíð 2 ella 3 ross til at reiða og draga við, so sum tilfar til hús og fjós o.a. hendan langa vegin heiman úr bygdini og upp um fjallið. Pløgt og dyrkað varð tó, tá stundir vóru til tess.

Í 1951 fekk hann studning til vegagerð av 300 m av vegi í Fámará og ímóti Vági. Hesin varð gjørdur frá húsunum í Fámará og niðan eftir. Seinri varð so játtað til 200 m afturat. So kom steðgur í, men í 1955 varð eitt sindur játtað aftur, og byrjað varð tá frá vegnum í Dalinum, sum tá var komin áleiðis á veg móti el-verkinum í Botni, sum tá skuldi útbyggjast við m.a. útskifting av vatnrørleidningi. So kom aftur steðgur í, men royndi hann sjálvur at lætta um arbeiðsbyrðuna við at gera — planera og fylla upp — ein stóran part av vegnum sjálvur.

Í 1968, tá sonur bóndan fekk sær gravkúgv, varð endiliga brotið í gjøgnum, og var nú ein grótvegur komin. Síðani tá hevur hann fingið nakað av peningi til at koyra tilfar úr tunlinum í Botni -- grús — til at slætta koyribreyt nakað við, men sum kunnugt heldur slíkt leyst grús ikki leingi á vegi í brattlendi, um tað liggur leyst í avfalli, sum vit so ofta hava.

Síðan tá er nú so nógv broytt til tað betra. Nú búgva tey í Fámará árið runt, hava fingið nútíðar fjós upp at standa, og í fjør fingu tey el-samband við SEV, áðrenn var einans privatur motorur, og hava tey nú mjólkimaskinur, kølitanga til mjólk og annað, sum hoyrir til eitt nútíðar jarðarbrúk, eins og nútíðar hóskandi amboð til velting, saksing, hoygging og taðing.

Í dag eru í Fámará 12 mjólkikýr og 23 ungneyt. Í fjør var mjólkaframleiðslan 50.000 litrar, og væntast hon at vaksa í ár til 75.000 litrar. Tað nýggja fjósið hevur pláss til 22 mjólkineyt og 23 ungneyt. Hesa fullskipan hava tey sett sær fyri at náa í 1984, og roknað verður við tá at framleiða 100.000 litrar av mjólk árliga.

Í dag eru uppdyrkaðir úr haga 75 ha (75.000 m²) og væl av lendi tøkt til at dyrka ikki bara til mjólkarframleiðslu. Eisini kunnu tey framleiða allar landbúnaðarvørur, so sum kjøt, fenað, egg, grønmeti o.a.

Meginparturin av óviðgjørdu mjólkini verður seldur í Vági, men er mjólkin so nógv umbiðin, at hon bert kann seljast familjum við børnum. At tørvurin á nýmjólk er og framyvir verður til eina so stóra og støðugt vaksandi bygd sum Vágur er eyðsæð, eins og langur vegur er, til rokkið er á mál, hvat mjólkaframleiðsluni her á landi viðvíkur, og eingin ivi er um, at nýupptikið grønmeti o.a. altíð er vælkomið.

Men alt stendur og fellur við einum sámuligum vegasambandi, um haldast skal áfram við jarðarbrúki í Fámará, eins og allar framtíðarætlanir innan landbúnaðin har. Tí er avgerandi, um vegurin verður gjørdur liðugur og asfalteraður, tí verandi vegur er einans ein grótvegur, sum ikki er koyrandi á við vanligum akførum, ofta er illa nokk koyrandi við traktori.

Vegastrekkið frá Fámará og vegnum í Dalinum er umleið 1 km., og hevur bóndin ókeypis gjørt helmingin av hesi vegalongd umleið 500 m.

Liðuggerð av vegnum, nakað av vegustokki er neyðugt eisini, er mett at kosta um leið 300.000 kr.

Fyri at stuðla hetta tiltakið, har um leið 75.000 m² eru veltir upp úr nýggjum, fyri at stuðla áhugan og møguleikan fyri, at hetta jarðarbrúkið kann útbyggjast enn meir, ikki bara Vágs bygd ella Suðuroynni, men landinum til frama við framleiðslu av føroyskum landbúnaðarvørum, seta vit Suðuroyar tingmenn fram hetta uppskot.

1. viðgerð 12. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av løgtingsmonnunum Ove Mikkelsen, Flemming Mikkelsen, Atla P. Dam og Sverra Midjord tann 9. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 12. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Adolf Hansen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Fredrik Olsen) sendir løgtinginum málið aftur, og mælir tinginum til, at málið fer í vega- og havnanevndina.

Minnilutarnir — Jørgen Thomsen og Ove Mikkelsen — taka støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í vega- og havnanevndina, sum legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Málið varð lagt fram av løgtingsmonnunum Ove Mikkelsen, Flemming Mikkelsen, Atla P. Dam og Sverra Midjord tann 9. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 12. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Við 2. viðgerð tann 31. mars 1982 var málið beint í Vega- og havnanevndina.

Ein samd Vega- og havnanevnd hevur í uppskotinum í álitinum um studningsjáttanir til vegir og lendingar skotið upp, at játtaðar verða kr. 200.000 til nevnda arbeiði.

Vísandi til frammanfyristandandi setir nevndin ti onki uppskot fram í hesum tingmálinum.

2. viðgerð 24. apríl. (Einki uppskot — málið avgreitt).

F.L.j.nr. 1817-56.

121. Innflutningsloyvi til P/f Norðstjørnan.

Ár 1982, týsdagin 9. mars legði Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, vegna Javnaðarflokkin fram.

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um sum skjótast at geva P/f Norðstjørnuni innflutningsloyvi til ein annan trolara í staðin fyri »Vón«, tað innflutningsloyvið, sum felagið kundi rokna við varð givið sambært samráðingar við undanfarna landsstýrið.

Viðmerkingar:

Á sumri 1980 seldu eigararnir av trolaranum »Vón« henda bát.

Henda søla var neyðug, tí tørvur var á meira hóskandi skipi.

Sølan varð framd í áliti til, at felagið, sum átti »Vón« fór at fáa innflutningsloyvi til ein annan trolara í staðin fyri »Vón«.

Eftir øllum at døma, t.v.s. upplýsingum frá felagnum Norðstjørnan, sum átti »Vón«, frá limum í undanfarna landsstýri og frá bløðunum, hevði felagið góða grund til at halda, at tað fór at fáa innflutningsloyvi til ein bát í staðin fyri tann, ið fór av landinum.

Hóast hetta dró málið út, og hin 25. januar spurdi løgtingsmaðurin Ove Mikkelsen løgmann, nær tað her umtalaða innflutningsloyvið kundi væntast at verða givið (sí tingmál nr. 86/1981).

Í svari sínum dagfest 9. februar 1982 til Ova Mikkelsen gevur løgmaður onga upplýsing um, nær innflutningsloyvi verður givið, heldur ikki tykist hann at vátta, at tað yvirhøvur verður givið.

Nú er so komið út í mars 1982, uttan at hetta mál er greitt, og meta uppskotsstillararnir tí, at tað er beint at reisa málið sum uppskot til samtyktar við ábeitan á landsstýrið um at geva umtalaða innflutningsloyvi alt fyri eitt.

Vit reisa hetta mál av tí, at tað hevur týdning fyri mong onnur enn teir, sum áttu m/t »Vón«, soleiðis sum vit her skulu vísa á.

Hóast ongar kanningar eru til taks, er tað øllum greitt, at eitt ávist arbeiðsloysi er í Suðurstreymoy eins og í landinum sum heild.

Serstakliga ger hetta arbeiðsloysi seg galdandi millum tey, sum starvast innan fiskiídnaðin.

Fyri arbeiðsfólkið á Baccalao hevur tørvandi innflutningsloyvi til ein bát í staðin fyri »Vón« verið ein dyggur smeitur sum vist hevur verið á fleiri ferðir í

bløðunum í scinasluni.

Fyri at bøta um arbeiðsstøðuna hjá teim, sum eru knýtt at fiskivinnu og fiskaarbeiði í Suðurstreymoy er tað átrokandi neyðugt at nevndu innflutningsloyvi verður givið nú.

Hetta skuldi ikki volt landsstýrinum nakrar politiskar ella prinsipiellar trupulleikar, eftir sum talan er um innflutningsloyvi til eitt skip, sum ikki kemur at broyta føroyska fiskiveiðumynstrið.

Út frá hesum verður hetta uppskot til samtyktar sett fram.

1. viðgerð 12. mars. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 19. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er framlagt 9. mars 1982 av løgtingsmonnunum Jóannes Dalsgaard, Juul Jacobsen, Karin Kjølbro, Jonn Henriksen og Erlendi Patursson og við fyrstu viðgerð 12. mars 1982 beint í fiskivinnunevndina.

Hetta mál snýr seg um, at løgtingið heitir á landsstýrið um at geva P/F Norðstjørnuni innflutningsloyvi til ein annan trolara í staðin fyri trolaran Vón, sum felagið hevur selt til Íslands.

Í samband við hetta mál er komið skriv til tingið frá Havnar Arbeiðsmannafelag og limum í Tórshavnar býráð.

Ove Mikkelsen hevur eisini í løgtingsmáli nr. 86/1981, sett løgmanni fyrispurning um hetta sama mál, sum hann hevur fingið svar uppá.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur svarað fyrispurningi frá løgtingsmanni um innflutningsloyvi av feskfiskatrolara til annað reiðari, løgtingsmál nr. 152/1981, so at løgtingið hevur fingið rættuliga gjølla frágreitt støðu landsstýrisins viðvíkjandi innflutningi av fiskiskipum.

Síðan hetta mál varð framlagt er hent tað, at P/F Norðstjørnan hevur fingið innflutningsloyvi frá landsstýrinum til annað skip í staðin fyri tað, teir seldu.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jógvan Olsen, Fredrik Olsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen) metir, at endamálið við hesum tingmáli er burturdottið og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Juul Jacobsen) setir fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Um landsstýrisins kønu menn viðmæla skipakeypið, so skal aldurin ikki hava tað avgerandi orðið.

Minnilutin (Juul Jacobsen) metir ikki, at tað er rætt, at áramálið upp í 3 ár verður sett. Um teir menn, sum landsstýrið hevur sett, viðmæla keyp av eldri skipi, so skal hetta gerast.

Minnilutin (Tórálvur Mohr Olsen og Hans Marius Joensen) hevur ta prinsipiellu áskoðan, at veiðuflotin so víst møguligt eigur at verða endurnýggjaður við nýggjum skipum.

Mett verður tó, at tað eigur at verða loyvt í ávísum førum at skifta skip í fiskiflotanum út við brúkt skip, um hetta annars lýkur allar vanligar treytir og annars verður nýtt til at royna eftir stovnum, sum frammanundan ikki eru ov nógv troyttir.

Viðvíkjandi spurninginum um innflutningsloyvi metir minnilutin ikki, at løgtingið vanliga eigur at leggja seg út í umsiting av hesum loyvum, uttan so at talan er um serligar umstøður.

Í fyriliggjandi máli um innflutningsloyvi til P/F Norðstjørnan, má tað haldast, at talan júst er um tílíkar serstakar umstøður. Umstøður, ið tala fyri eini serligari loysn av hesum máli.

Minnilutin skal í hesum sambandi vísa á

at teir, sum áttu Vón, høvdu allar grundir til at væntа sær innflutningsloyvi til eitt annað skip í staðin fyri Vón,

at tann fundur, sum nevndin hevur havt til umboð fyri reiðariið, prógvaði, at menn ikki høvdu selt Vón, um teir ikki kendu seg vísar í at fáa innflutningsloyvi til annan bát,

at eigarar, arbeiðsfólk á landi og ávís virki hava havt stórt tap orsakað av at landsstýrið ikki hevur hildið lyfti sítt,

at talan meira er um eitt umbýtisloyvi enn um eitt innflutningsloyvi,

at trolarin, sum søkt verður um, ikki kemur at broyta fiskiveiðumynstrið á Føroyaleiðini munandi,

at felagið, sum átti Vón ongan møguleika hevur fyri at figgja eitt nýtt skip,

at tað eisini hevði verið ov leingi at biða eftir nýggjum skipi,

at alt, sum fram er farið í málinum, samanum tikið bendir á, at menn seldu Vón í góðari trúgv.

Út frá hesum má tað haldast vera beint, at P/F Norðstjørnan fær tað innflutningsloyvið, sum felagið hevur søkt um, í staðin fyri eitt innflutningsloyvi, sum felagið ongan møguleika hevur at nýta.

Minnilutin metir tí, at tað eigur at verða álagt landsstýrinum at geva Norðstjørnuni innflutningsloyvi til ein trolara, sjálvt um hesin trolari skuldi verið eldri enn 3 ár og setir tí í staðin fyri uppskotið hjá teimum 5 Suðurstreymoyartingmonnunum fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið ásannar at í spurninginum um annað skip í staðin fyri M/T »Vón«, er talan um serligar umstøður, og áleggur tí landsstýrinum alt fyri eitt at geva P/F Norðstjørnuni innflutningsloyvi til ein trolara, sjálvt um hesin skuldi verið eldri enn 3 ár.

2. viðgerð 20. apríl. Atkvøðugreiðsla 21. apríl. Minnilutauppskot frá Juul Jacobsen fall við 8 ja-atkvøðum, 21 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Andrias P. Jacobsen, Ove Mikkelsen.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen og Pauli Ellefsen.

Uppskotið frá minniluta (Hans M. Joensen og Tórálvur M. Olsen) fall við 15 ja-atkvøðum, 15 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu: Juul Jacobsen, Adolf Hansen, Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur Mohr Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Andrias P. Jacobsen, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen, Óli Breckmann.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Flemming Mikkelsen, Guttorm Klein, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Petur Reinert, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Jógvan Olsen, Pauli Ellefsen og Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen.

122. Broyting í lógunum fyri Føroyar um fólkapensjón, avlamispensjón v.m., almenna sjúkratrygging og barnagjøld til stakar uppihaldarar.

Ár 1982, týsdagin 9. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at hjálagda »Forslag til Lov om ændring af forskellige lovbestemmelser for Færøerne om sociale ydelser (Forhøjelse og teknisk justering af satser m.v.) verða framd.

Viðmerkingar:

Uppskotið til samtyktar snýr seg um eitt uppskot til eina felags broytingarlóg, sum broytir fýra ymiskar lógir á almannaøkinum um ávikavist fólkapensjón, avlamispensjón, sjúkrakassar og barnagjøld.

Annars fevnir uppskotið um tvey ymisk viðurskiftir: a) Nullstilling og b) hækkan av pensjónum v.m.

a) Nullstilling er ein broyting av reint tekniskum slagi. Reglurnar í donskum lógum um prístalsjavnan eru nettiliga nágreiniligar, og tá prístalsgrundarlagið verður broytt sum frá januar 1975 = 100 til januar 1980 = 100, verða sjálv tølini í donsku pensjónslógunum broytt, tó soleiðis at úrslitið av prístalsjavningini verður tað sama. Av tí at tær føroysku pensjónirnar verða prístalsjavnaðar á sama hátt sum tær donsku, er tað neyðugt at broyta tølini í teimum føroysku lógunum á sama hátt.

Hesar teknisku broytingarnar standa í § 1, § 3, § 5 og § 6.

b) Hækkan av pensjónsgjøldunum er umrødd í § 2 og § 4. Landsstýrið er verðið samt við rikisstýrið um, at pensjónsgjøldini verða hækkað frá 1. apríl í ár at rokna.

Talan er um eina partvísa ajour-føring — so langt sum rikisstýrið vildi ganga í so máta — av føroysku pensjónunum við tær donsku.

Grundarupphæddirnar verða eftir uppskotinum hækkaðar við 15,6 % fyri støk og við 12,8 % fyri hjún (tilsamans tá báðir húnafelagar eiga pensjón).

Pensjónsviðhøturnar verða hækkaðar við 10,6 % fyri støk og við 53,3 % fyri hjún.

Mánaðarligu pensjónsgjøldini fyri pensjónistar uttan aðra inntøku kunnu eftir núverandi prístali setast upp soleiðis:

Støk:	Sum nú	Uppskotið	Munur	
Grundarupphædd	1.950 kr.	2.255 kr.	305 kr.	15,6%
Pensjónsviðbót	368 kr.	407 kr.	39 kr.	10,6%
Støk tilsamans	2.318 kr.	2.662 kr.	344 kr.	14,8%
Hjún:				
Grundarupphædd	2.998 kr.	3.382 kr.	384 kr.	12,8%
Pensjónsviðbót	413 kr.	633 kr.	220 kr.	53,3%
Hjún tilsamans	3.411 kr.	4.015 kr.	604 kr.	17,7%

Meirútreiðslurnar av uppskotinum eru mettar til 20,4 mió. kr. árliga, harav ríkiskassin rindar um 9,9 mió. kr., meðan føroyski parturin er um 10,5 mió. kr. Harav rindar landskassin um 9,3 mió. kr. og kommunurnar um 1,2 mió. kr.

Annars verður vist til viðmerkingarnar, sum almannaráðið hevur gjørt.

Sí skjal 14.

1. viðgerð 12. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting 9. mars 1982 av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð 12. í s.m. beint í sosialu nevndina.

Uppskotið snýr seg um hækking av pensjónunum v.m. til fólka- og avlamispensjónistar, almenna sjúkratrygging og barnagjøld til stakar uppihaldarar.

Seinast føroysku pensjónirnar hækkaðu, burtursæð frá prístalshækking, var pr. 1. apríl 1975.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum og frá almannaráðnum verður vist á, hvussu nýggju pensjónsgjøldini skulu býtast og hvør hækkingin er. Meirkostnaðurin er mettur til tilsamans 20,4 mió. kr. árliga.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 31. mars. Uppskotið varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-5.

123. Broyting í »Lov for Færøerne om haugers styrelse og drift«.

Ár 1982, mikudagin 10. mars legði Karin kjølbro, løgtingslimur vegna Ova Mikkelsen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um

lagtingslov om ændring i Lov nr. 172 af 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers styrelse og drift m.m., fjerde afsnit. Haugens græsningsret for får på indmark, kap. 8, stk. 34.a:

Som nyt stk. 34 a indsættes:

§ *1*. I de bygder og byer, hvor indmarken er matrikuleret i henhold til bekendtgørelse nr. 198 af 15. juli 1931, skal ethvert bygde- og byråd have ret til at gøre særlige lokale undtagelsesregler fra de generelle regler, som denne lov indeholder. Også om vedkommende bygde-/byråd vedtager, at haugens vintergræsningsret for får på indmark skal begrænses til kun græsning på vedkommende haugeejers egen indmark, der dog skal være forsvarligt indhegnet, således at fårene ikke kan trænge ind på anden mands ejendom. Dog skal slige bygde- og byråds vedtægter, der begrænser gældende græsningsret for får på indmark behørigt offentliggøres ved opslag i de offentlige bygde-/bybekendtgørelsestavler, samt i de færøske dagblade, senest den 1. juli i det år slige vedtægter træder i kraft.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. juni 1982.

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum árum síðani sendi Klaksvíkar , Tvøroyrar og Vágs býráð umsókn til tingið um at fáa loyvi at friða bøin fyri leysgangandi seyði á beiti alt árið.

Henda umsókn varð send landsstýrinum, har umsóknin varð »súltað« leingi, men kom so endiliga aftur á ting við tí viðmerking frá landsstýrinum, at lógin ikki loyvdi hetta, og at yvirhagin átti óskerdan rætt til vetrarbeiti á undirhaganum. Síðani hendi einki meir við hesi umsókn frá Føroya næststørstu trimum býum.

Øll jarðalóggávan er gomul og eftir míni meting avoldað í nógvum førum. T.d. er øll tingmanningin væl vitandi um, at so gott sum øll innmarkin — bøurin í okkara býum og í teim størstu bygdunum er farin undir asfalt og beton. Bøurin, vetrarbeitið, er nærum ikki til, allur meir og minni lagdur undir veg og nýttur til húsagrundir.

Eisini vita vit, at seyðurin, sum gongur leysur í teim størru bygdum og býum er til stóran ampa fyri øll. Stórur partur av íbúgvunum av teim størru plássunum eru ognar- og seyðaleysir. At urtagarðar o.a. ikki fáa frið, tí um seyður einaferð hevur lopið um stik, leypir alt fylgið av heimaseyði eftir o.s.fr. Hvussu harmiligt er tað ikki, tá heimaseyðurin ger kál á tí, sum fólk við stríð og strev hava roynt at hampað uttan um húsini og í teirra urtagørðum.

Burtursæð frá omanfyri nevnda meti eg tað vera reint djóraplágari, at heimaseyðurin gongur, sum hann gongur í teim størru plássunum og líður beinleiðis hungur og neyð, livir eina mest at pappíri og ruski, gongur uttan nakra sum helst ansan ella eftirlit frá eigarunum. Tað er ikki óvanligt at síggja heimaseyð ganga allan veturin í kulda og regni við stórum parti av ullini skræddari av og við stórum blettum av berum holdi, tá hann í sini áhaldandi leiting eftir føði hevur hingið fastur í rustaðum stiki ella nøglum. Slík viðferð av okkara ómælandi kriatúrum er ósømilig fyri eitt sokallað kristið fólk.

Nú er so gott sum øll innmarkin í Føroyum matrikulerað, og náttúrligt hevði verið, at ein og hvør eigari av seyði ella øðrum kriatúrum hevði hesi inni á síni egnu ogn, har eigarin kundi ólarnaður av annara manns kriatúrum livga um sín seyð o.a. Tað er líkamikið, hvat ein eigari hevur inni á sínum væl avstikaðu ogn av kriatúrum og viðkemur ongum, um hetta einans ikki er til ampa fyri onnur. Kriatúrini fáa tá eisini tað eftiransing, sum sømir seg.

Tá so, í hesum føri 3 býráð, ynskja at koma hesum øgiliga djóraplágari og støðuga forargilsi fyri øll til lívs, vildi eg mett, at tað var rætt, at tingið gekk teimum á møti við at broyta galdandi lóg, tí neyðugar lógarbroytingar kann jú einans Føroya Løgting gera.

Lógin er bert skriva á donskum, men um nevndin sum fær málið til viðgerðar heldur, at tað ber til at fáa føroyskt orðalag, so fari eg at biðja um, at nevndin ger hetta, eisini um neyðugt at orða lógarbroytingina betri og annarsleiðis, um metl verður so. (Vist verður til lóg nr. 170 og 172 frá 18. mai 1937).

Við hesum loyvi eg mær at seta fylgjandi lógaruppskot fram.

1. viðgerð 12. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

álit

Málið varð framlagt av Ova Mikkelsen tann 10. mars 1982 og við 1. viðgerð 12. s.m. beint í lóganevndina.

Uppskotið er sett fram fyri at koma ynskjum frá Klaksvíkar, Tvøroyar og Vágs býráðum á møti um at fáa loyvi at friða bøin fyri leysgangandi seyði á beiti alt árið.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið upplýst, at spurningurin viðvíkjandi leysgangandi seyði nú er loystur í Klaksvík, aftaná samráðingar millum býráðið og hagastýrini. Nevndin heldur, at sami framferðarháttur eisini eigur at verða nýttur í Vági og á Tvøroyri, áðrenn tingið ger meira við máli.

Kommununrnar fáa eintøk av hesum áliti.

2. viðgerð 27. apríl. Uppskotið fall við 10-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.

---

124. Uppskot til samtyktar um at núverandi landsstýrislimir leggja størvini frá sær.

Ár 1982, mikudagin 10. mars legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Av tí at innanhýsisklandrið í núverandi landsstýri og samgongu stendur við og versnar í hvørjum — á opnum tinglundi í dag legði ein av tingmonnunum samgongunnar ein av landsstýrismonnunum undir beinleiðis lygn — og tað av øllum brøgdum er ljóst, at landsstýrið í veruleikanum er púra óarbeiðsført, heitir løgtingið

á núverandi landsstýrislimir um beinan vegin at leggja størvini frá sær, soleiðis at løgtingið fær atstøður til at velja annað og arbeiðsført landsstýri.

Við loyvi um frávik fekk málið 1. viðgerð. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

12. mars varð fylgiskjal til málið útbýtt.

Uppskot til starvsskrá fyri komandi landsstýri apríl 1982 - november 1984.

1.

Í búskaparmálum er meginstevnan tann at hava alt vinnuført fólk í vinnu og at koma tí vinnuloysi, ið serstakliga millum ungfólk er farið at gera vart við seg, til livs.

Hetta týðir m.a., at útbyggingin av landinum og av vinnulívinum heldur fram.

Endurútbúgvingin verður sett í verk.

2.

Kelduskattaskipan undir almennari umsiting verður sett í verk frá 1. januar 1984.

Fyri komandi fíggjarári verður settur í gildi serstakur háinntøkuskattur á øllum inntøkum yvir ávíst hámark. Síðani verða kannaðir møguleikarnir til at lækka skattin á láginntøkum, soleiðis at hesar lækkingar koma í gildi frá fíggjarárinum 1983/84.

3.

Sum ein liður í bygdamenningarpolitikkinum verður hildið fram við at bøta um vegasambandið við fjarskotnar bygdir. Av trygdarorsøkum verður neyðugt at fara undir Leirvíkartunnilin beinan vegin.

4.

Á komandi fíggjarlóg verða 50 mió. kr. settar til umlegging av fiskiveiðini og aðrar 50 mió. kr. veittar menningargrunninum at nýta til at skapa alternativar vinnumøguleikar í idnaði uppi á landi (virking av m.a. svartkjafti, høgguslokki og skeljafiski).

Nú beinan vegin verða settar í gildi — eftir tilmælum fiskivinnuráðsins — reglur, ið skipa fyri botnfiskiveiðini á landleiðini.

Allur fiskur veiddur av føroyskum skipum á landleiðini eigur at koma til virkingar í landinum.

Øll studningsskipan fiskivinnunar verður endurskoðað, m.a. soleiðis at oljustudningurin verður tikin úr gildi.

Frá 1. januar 1983 heldur øll útlendsk veiða eftir botnfiski á landleiðini upp at.

Sokallaðar fiskiroyndir á fjarskotnum leiðum (Senegal, Mauritaniu og aðrar staðir) halda upp at.

Í komandi ólavsøkutingsetu verða samtykt uppskot um neyðugar umskipanir í stýrisskipanarlógini og í teim donsku-føroysku figgjarviðurskiftum, ið skulu økja um ræði løgtings og figgjarliga sjálvbjargni landskassans (føroyskur heimarættur, føroysk uttanríkismál, føroyskt pass, føroyskt mál — minkandi blokkveitingar yvir ávist áramál).

6.

Í komandi ólavsøkutingsetu verður samtykt lóg um føroyskan ognarrætt til undirgrund og havbotn og um nýtslu av hesum náttúruríkidømum.

7.

Løgtingið ger Norðurlandaráðnum kunnugt, at tað er ikki nøgt við aðra føroyska luttøku í ráðnum enn fulla føroyska luttøku á jøvnum føti við aðrar limir ráðsins.

8.

Landsbankamálið verður loyst sambært landsbankalógini, soleiðis at landsbankin kemur at virka ikki seinni enn 1. januar 1983.

2. viðgerð 16. mars. Uppskotið fall við 13 ja-atkvøðum, 17 atkvøddu ikki og 2 vóru burturstaddir.

Ja atkvøddu: Vilhelm Johannesen, Jóannes Dalsgaard, Tórálvur M. Olsen, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Jona Henriksen, Atli Dam, Ove Mikkelsen, Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Petur Reinert, Finnbogi Isaksen, Hans M. Joensen.

Atkvøddu ikki: Flemming Mikkelsen, Guttormur Klein, Hilmar Kass, Fredrik Olsen, Juul Jacobsen, Adolf V. Hansen, Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Øssur Dam Jacobsen, Svend Aage Ellefsen, Edmund í Garði, Eilif Samuelsen, Johs. M. Olsen, Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein.

Burturstaddir: Jógvan Olsen, Pauli Ellefsen.

---

125. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars boðaði formaðurin frá fyrispurninginum frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1) Tá flúgvingin við »Tyrlu« ikki fekk loyvi at halda fram, hví var tá ikki sum tilmælt av figgjarnevndini, ein fyribils sáttmáli gjørdur við donsku sjóverjuna um at halda fram við neyðsynjarflúgving, eins og áður hevði verið gjørt ókeypis?
2) Um orsøkin er tann, at núverandi marinu-helikoptari krevur fast lendi fyri at seta seg á, hvi eru so ikki tey neyðugu lendingarpláss gjørd á teim ymisku plássunum, har tørvur er á slíkum lendistøðum? Tey skuldu jú gerast kortini, um tað so var »Tyrla«, sum fleyg.
3) Hevur landsstýrið yvirhøvur nakra ætlan um eina fyribils loysn, sum kann geva Gásadali og útoyggjunum teirra helikoptara-tænastu, sum hesi plássini hóast alt høvdu, áðrenn landsstýrið av sínum cintingum setti ta miseyndaðu samferðsluheildarloysn við »Tyrlu« í verk?
4) Hevur landsstýrið gjørt nakra hugsan ella fyrireikingar, um hvussu hendan neyðuga loftvegis neyðsynjartænasta kann loysast einaferð við alla?
5) Ætlar landsstýrið púrt einki at gera við eina fyribils loysn og sostatt sleppa Gásadali og útoyggjunum aftur í ta somu støðu, hesi pláss høvdu samferðsluliga, áðrenn fyrsti helikoptarin lendi í Føroyum?

Viðmerkingar:

Tá meirilutin í figgjarnevndini í heyst avgjørdi, at helikoptara flúgving við tí leigaðu »Tyrlu« ikki skuldi halda fram, so var hetta gjørt sum mótmæli ímóti landsstýrisins ætlan um, at hesin útlendski helikoptarin skuldi avloysa øll tey smærru strandfaraskipini, sum røkja útoyggjasiglingina, eins og einki berghol ella vegasamband til hesi pláss skuldi gerast í allari framtíð.

Kortini var øll figgjarnevndin samd um og ásannaði, at tað er og verður altíð tørvur á eini helikopturulætnastu í okkara oyggjasamfelag til neyðsynjar- og hjálparflúgving, líkamikið hvussu væl vanligt samferðslusamband verður útbygt.

Tí skutu eg og fleiri figgjarnevndarlimir upp m.a.:

1. At ein fyribils avtala skuldi gerast við donsku sjóverjuna, sum jú hevur ein helikoptara at ráða yvir, um at røkja nakað av hesi neyðsynjarflúgving, inntil funnið verður fram til eina endaliga loysn á hesum máli.
2. At landsstýrið beinanvegin fer undir at gera tey helioport — lendingarpláss til helikoptarar — sum ætlanin var at byggja, um »Tyrla« helt fram og cisíni á teimum plassum, har tørvur er á slíkum helikoptaralendingarplássum.
3. At landsstýrið beinanvegin skuldi fara undir kanningar um at keypa og røkja ein helikoptara, sum møguliga skuldi verða rikin av vaktar- og bjargingartænastuni við møguleika til alla útleigu, tó fyrst og fremst til strandferðsluna.

Men útoyggjarnar og Gásadalur hava síðan ligið uttan samband í longri og styttri tíðir. Eitt nú hava Gásadalur og Mykines verið uttan nakað slag av sambandi nú í seinastum í 8 samfyllar vikur.

Ein má spyrja, hví so er vorðið? Er hetta eitt hevndartiltak, ti »Tyrla« ikki fekk loyvi at halda fram?

Er hetta kanska eitt lið í sitandi samgongu sparipolitikki, at mett verður, at tað er bíligari at avtofta allan útjaðaran burtur av? Skuldi tað eydnast, eru Føroyar bæði fátækari og minni. Júst tí at hesi pláss eru gloymd, meðan restin av landinum er væl útbygt samferðsluliga, er hjá einum hvørjum landsstýri at bøta um hetta órættvísi móti teimum fólkum, sum hava hildið út at verða búgvandi í hesum útoyggjum og plássum urtan nakað regluligt ferðslusamband — í einum føri púrt einki samband við restina av landinum.

Tað má átalast, at hesi pláss soleiðis verða týnd av ti almenna, og ásannast, at viðferðin av hesum føroyingum av sitandi landsstýri er ein landsskomm.

Tí loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum Páll Vang, sum hevur ferðslumál um hendi, hendan fyrispurningin.

Við 24-0 atkvøðum var seinni sama dag samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum.

1. apríl svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

1. Sum støðan er í dag eru bert 6 heliportur, ið hava fast undirlag — antin betong ella asfalt — og sostatt kann helikoptarin hjá donsku sjóverjuni bert lenda á hesum seks plássum, Tvøroyri, Dimun, Mykines, Tórshavn, Klaksvík og Kirkju.

   Sostatt var ikki møguligt at gera ein sáttmála um regluliga flúgving.

   Viðmerkjast kann tó, at helikoptarin hjá donsku sjóverjuni hevur gjørt einstakar ferðir til smábygdir við neyðsynjarvørum.
2. Longu, tá Tyrla fleyg, var heitt á landsverkfrøðingin um at lata gera heliportar á útoyggjunum og í teimum bygdum, har einki vegasamband er til.

   Hildið verður áfram við hesum arbeiðuni, og væntast tey at vera liðug í juni mánaða í ár.
3. & 4. Landsstýrið hevur ongar ætlanir um eina endaliga fyribilsloysn — vísandi tit svar til 1. spurning.
5. Á landsstýrisfundi 26. mars í ár varð samtykt at taka helikoptaraflúgving upp-aftur á sumri 1982.

   Herta er ein landsstýrissamtykt, og er hon galdandi, um hon ikki verður broytt.

126. Partapeningur í P/f Faromar, Tórshavn.

Ár 1982, friggjadagin 12. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um partapening í P/f Faromar, Tórshavn.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til kr. 100.000 av tí kravda partapeninginum í P/f Faromar, Tórshavn, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om aktier i P/f Faromar, Tórshavn.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges landskassens vegne at tegne aktier i P/f Faromar, Tórshavn, med et beløb på op til kr. 100.000 af den forlangte aktiekapital, og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Út frá tí metan, at Føroyum tørvar alternativar vinnumøguleikar, varð eitt nýtt felag stovnað í oktober 1981, hetta fekk navnið P/f Faromar við heimstaði í Havn.

Partapeningurin varð settur til kr. 550.000 + ein garantipening uppá kr. 200.000, soleiðis at samlaði eginpeningurin kom at vera kr. 750.000.

Av hesum hava hesir teknað seg fyri

Faroe Seafood Trading Co.	kr. 150.000
P/f Føroya Fiskiídnaður	kr. 100.000
P/f Føroya Banki	kr. 100.000
P/f Sjóvinnubankin	kr. 100.000
	kr. 450.000

Landsstýrið (løgtingið) er biðið um at tekna kr. 100.000,- í partapeningi og kr. 200.000 í garantipeningi.

P/f Faromar í samband við J. Lauritzen Holding Co., Keypmannahavn, hava gjørt fyrireikingar til, at royndarfiskiskapur kundi byrja í vestur-afrikanskum sjógvi, fyrst og fremst út fyri Senegal, alt í samband við danska stovnin IFU —

Industrialiseringsfonden for udviklingslandene — sum figgjar royndarprojekt við einum láni upp á kr. 2,7 mió. Seinni er ætlanin, at Danida møguliga eisini skal upp í hetta »joint-venture«-arbeiðið.

Myndugleikarnir í Senegal seta sum treyt fyri eitt hvørt virksemi har, at tað verður skipað í einum felagi við heimstaði og lutløku úr Senegal.

P/f Faromar og Lauritzen hava tí stovnað partafelag í Dakar, Senegal, »Senegal Seafood«, við einum partapeningi uppá 100 mió. C.F.A = f.kr. 2.580.000,00. Av hesum hava Faromar og Lauritzen teknað 49% ella tils. f.kr. 1.264.000 helvt um helvt. Ætlanin er so, at restin umleið í september 1982 skal yvirtakast av feløgum í Senegal.

Senegal Seafood hevur síðani leigað M/S »Sjúrð Tollakson«, sum er byrjaður royndarfiskiskap við Vestur-Afrika.

Hesar royndir skulu so gera av, um royndirnar skulu gerast veruleiki í einum seinni stigi, har útvegast skulu fiskiskip/framleiðsluvirkir/flutningsvegir/»marketing« og sølutól við tí í byggju at fiska í vestur-afrikanskum sjógvi og stýra tær framleiddu vørurnar til marknaðir, helst í Guinea-víkini (frá Cote d'Ivoiri til Cameroun) og í Suður-Europa.

Tað kann vera talan um fyrst í 1983 at víðka eginpeningin í Senegal-Seafood til 1 mia. C.F.A. = f.kr. 26 mió. Ognarviðurskiftini skulu t.d. tá verða

Senegal	510.000 C.F.A.
IFU	245.000 —
J.L.	122.500 —
Faromar	122.500 —

Faromar víðkar eginpeningin frá kr. 750.000 til 5 mió. kr., soleiðis t.d.

Faroe Seafood Trading	kr.	600.000
Føroya Fiskiídnaður	kr.	300.000
Føroya Banki	kr.	250.000
Sjóvinnubankin	kr.	250.000
Skip I	kr.	250.000
Skip II	kr.	250.000
Skip III	kr.	250.000
Føroya Landsstýri	kr.	350.000
	kr.	2.500.000
Garantipeningur	kr.	2.500.000
Tilsamans	kr.	5.000.000

Hugsast kann, at garantipeningurin uppá 2,5 mió. kr. kann fáast til vega við sølu av einum ella tveimum skipum til Senegal Seafood, har eitt realistiskt frívirði

(munur millum sølupris og prioritetir, sum kunnu yvirtakast av Senegal Seafood) verður at figgja frá Føroyum. Um tað ikki á henda ella annan hátt er gjørligt at fáa nóg mikið av hesum peningi tilvega frá privatari síðu, verður møguliga heitt á landsstýrið um veðhald.

Eitt aðalsjónarmið í samarbeiðinum millum Faromar og J. Lauritzen Holding Co. er, at føroyskur og danskur kapitalur skal samvirka á 50-50% grundarlagi. Í londum, har lokalur kapitalur skal inn í tílík projekt, vanliga við minst 51%, skal lutfallið millum danskan og føroyskan kapital støðugt vera 50-50, soleiðis at føroyingar ikki bert skulu lata eina eingangsvøru í formi av t.d. fiskikunnleika, men verða verandi í øllum liðum av teimum aktivitetum, sum kunnu standast av teimum fyrstu stigunum í tílíkum menningararbeiðum.

Landsstýrið og figgjarnevndin hava í hesum sambandi samtykt at veita veðhald fyri láni kr. 200.000 til royndarfiskiskap. Hetta veðhaldið er játtað við heimild í figgjarlógini av konto undir stuðul til fiskivinnuna á fremmandum økjum.

Tá landsstýrið heldur, at tørvur er á alternativum vinnumøguleikum, eitt nú í fremmandum sjógvi, verður uppskot lagt fram um at seta kr. 100.000 í partapeningi í P/f Faromar.

1. viðgerð 17. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 17. mars 1982 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 15. apríl 1982 og hevur býtt seg í ein meiriluta og triggjar minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Guttorm Klein) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Jørgen Thomsen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Juul Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 27. apríl. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 17-11, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

28. apríl legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Sum nýggj § 2 í landsstýrisins uppskoti verður sett:	Som ny § 2 i landsstyrets forslag indsættes:

»§ 2. Landskassans partapeningur er tó treytaður av, at partabrøvini alment eru boðin til sølu fyri pari-kurs.
2. stk. Tey partabrøv, sum eingin áhugaður keypari er til, kann landsstýrið keypa, Tó í fyrsta lagi mánaðardagin eftir at tey eru lýst alment til sølu sbrt. 1. stk.

§ 2 verður § 3.«

»§ 2. Landskassens aktiekapital er dog betinget af, at aktierne er offentligt udbudt til salg til pari kurs.
Stk. 2. De aktier, som der ikke er interesseret køber til, kan landsstyret købe, dog først een måned efter, at de er offentligt annonceret til salg i henhold til stk. 1.

§ 2 bliver § 3.«

3. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskotið frá Adolf Hansen fall við 8-1 atkvøðum. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-10 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1524-38 Lóg nr. 57 frá 6. mai 1982.

---

127. Løgtingslóg um bjálvingarstuðul til pensjónistar.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um bjálvingarstuðulslán til pensiónistar.

lagtingslov om isoleringstilskudslån til pensionister.

§ 1. Bjálvingarstuðulslán kunnu játtast avlamis-, einkju og fólkapensiónistum, sum búgva í egnum húsum.
2. stk. Egin hús eru at skilja sum hús, ið bert viðkomandi pensiónistur og/ella hjúnafelagin er eigari av sambært tingbókina.
3. stk. Tá heilt serligar umstøður eru, kann Almannastovan møguliga við

§ 1. Isoleringstilskudslån kan bevilges invalide-, folke- og enkepensionister, som bor i eget hus.
Stk. 2. Ved eget hus forstås hus, som i henhold til tingbogen alene ejes af vedkommende pensionist og/eller ægtefællen.
Stk. 3. Når ganske særlige omstændigheder foreligger, kan Almannastovan

serligum treytum gera frávik frá ásetanini í 2. stk.

§ 2. Bjálvingarstuðulslán eru avdráttar- og rentufrí.
2. stk. Avdráttar- og rentufrítøkan heldur fram, um pensiónistur doyr, og einkjan ella einkjumaðurin situr í óskiftum búgvi ella annars verður eigari av húsunum, sjálvt um viðkomandi ikki er pensiónistur.

3. stk. Avdráttar- og rentufrítøkan heldur uppat, tá annar eigari enn nevnt í § 1, 2. stk. yvirtekur húsini. Um nýggi eigarin er pensiónistur, kann Almannastovan loyva, at avdráttar- og rentufrítøkan heldur fram.
4. stk. Avdráttar- og rentufrítøkan heldur uppat, tá viðkomandi heldur uppat at verða fólkapensiónistur, um atvoldin til hetta ikki er inntøkuviðurskifti, ella tá viðkomandi heldur uppat at verða avlamispensiónistur, uttan so at viðkomandi verður játtað avlamisveiting ella skiftir til fólkapensión. Um einkja heldur uppat at hava einkjupensón, heldur avdráttar- og rentufrítøkan fram.

§ 3. Um pensiónistur fær varandi upphald á einum ellis- ella røktarheimi ella øðrum stovni, har somu reglur um pensiónsútgjalding eru galdandi, og húsið hjá viðkomandi verður nýtt av øðrum enn hjúnafelaganum, heldur avdráttar- og rentufrítøkan uppat.
2. stk. Um pensiónistur og møguligur hjúnafelagi flyta úr viðkomandi húsum, kann Almannastovan gera av, at avdráttar- og rentufrítøkan skal

eventuelt på særlige vilkår gøre undtagelse fra reglen i stk. 2.

§ 2. Isoleringstilskudslån er afdrags- og rentefri.
Stk. 2. Fritagelsen for afdrag og renter fortsætter, hvis pensionisten dør, og enken eller enkemanden sidder i uskiftet bo eller på anden måde bliver ejer af huset, selv om vedkommende ikke selv er pensionist.

Stk. 3. Fritagelsen for afdrag og renter ophører, såfremt en anden end de i § 1, stk. 2, nævnte personer bliver ejer af huset. Såfremt vedkommende nye ejer er pensionist, kan Almannastovan tillade, at fritagelse for afdrag og renter fortsætter.
Stk. 4. Fritagelsen ophører, når vedkommende ophører at være folkepensionist, hvis ikke dette skyldes indtægtsforhold, eller når vedkommende ophører at være invalidepensionist, med mindre der bevilges vedkommende invalidetitelsydelse, eller vedkommende overgår til folkepension. Såfremt en enke ophører med at modtage enkepension, fortsætter fritagelsen for afdrag og renter.

§ 3. Såfremt en pensionist tager vedvarende ophold på et alderdoms- eller plejehjem eller en institution, hvor samme regler om pensionsudbetaling gælder, og vedkommendes hus benyttes af andre end ægtefællen ophører fritagelsen for afdrag og renter.
Stk. 2. Såfremt pensionisten og en eventuel ægtefælle fraflytter huset, kan Almannastovan bestemme, at fri-

halda uppat.

tagelsen for afdrag og renter skal ophøre.

§ 4. Tá avdráttar- og rentufrítøkan sambært §§ 2-3 heldur uppat, verður bjálvingarstuðulslánið broytt soleiðis, at avdráttur og renta verða at gjalda eftir teimum reglum, sum tá eru galdandi fyri um- og tilbyggingarlán frá Húsalánsgrunninum.

§ 4. Når fritagelsen for afdrag og renter ophører i medfør af §§ 2-3, ændres isoleringstilskudslånet således, at der skal betales afdrag og renter efter de da gældende regler for om- og tilbygningslån fra »Húsalánsgrunnurin«.

§ 5. Almannastovan ger av, um bjálvingarstuðulslán skal verða játtað einum pensiónisti.
2. stk. Um fíggjarligu viðurskifti umsøkjarans víkja munandi frá teimum hjá øðrum pensiónistum, kann Almannastovan sýta honum bjálvingarstuðulslán.
3. stk. Um Almannastovan annars heldur, at bjálvingarstuðulslán er ikki avgjørt fyri neyðini, t.d. tá skyldfólk ella onnur búgva inni, kann Almannastovan sýta einum bjálvingarstuðulslán.

§ 5. Almannastovan afgør, om der skal bevilges isoleringstilskudslån til en pensionist.
Stk. 2. Hvis ansøgerens økonomiske forhold er væsentligt forskellige fra andre pensionisters, kan Almannastovan afslå at bevilge isoleringstilskudslån.
Stk. 3. Hvis Almannastovan iøvrigt skønner, at isoleringstilskudslån ikke er strengt nødvendigt, f.eks. når slægtninge eller andre også bor i huset, kan Almannastovan afslå at bevilge isoleringstilskudslån.

§ 6. Bjálvingarstuðulslán verða tryggjað við upprykkjandi tinglisnum veðrætti í viðkomandi húsum. Veðhavari er Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin, samanber § 11.

§ 6. Isoleringstilskudslån sikres ved tinglyst (tinglæst) oprykkende panteret i det pågældende hus. Panthaver er Isoleringstilskudslånefonden, jfr. § 11.

§ 7. Bjálvingarstuðulslán til eini hús kann hægst vera 20.000 kr. til útreiðslurnar av sjálvari bjálvingini. Haraftrat kunnu leggjast útreiðslur til kanning og eftirlit, samanber § 8, tinglesing og byggirentur sambært § 11, 2. stk.

§ 7. Isoleringstilskudslån til et hus kan højst udgøre 20.000 kr. til udgifterne til selve isoleringen. Hertil kan lægges udgifter til undersøgelse og tilsyn, jfr. § 8, tinglysning (tinglæsning) og byggerenter i henhold til § 11, stk. 2.

§ 8. Tá umsókn um bjálvingarstuðulslán er játtað, verða húsini kannað av

§ 8. Når ansøgning om isoleringstilskudslån er bevilget, undersøges

vanligu metingarmonnum Húsalánsgrunsins ella, um slíkir eru tilnevndir, serliga bjálvingarkønum persónum.

2. stk. Tey í 1. stk. nevndu fólkini gera meting um tørvin á bjálvingartiltøkum, uppsett í raðfylgju eftir tørvinum, saman við kostnaðarætlan fyri hvørt einstakt tiltak.

3. stk. Tað er ein treyt fyri gjalding av bjálvingarstuðulsláni, at tey í 1. stk. nevndu fólkini hava váttað, at bjálvingin er gjørd samsvarandi galdandi reglum.

4. stk. Um so er, at viðkomandi pensiónistur sjálvur heilt ella partvis útinnir sjálvt arbeiðið við bjálvingini, kann hetta ikki íroknast útreiðslurnar.

§ *9.* Uttan í teimum førum, har Almannastovan tekur avgerð, verður henda lóg fyrisitin av Húsalánsgrunninum, um neyðugt í samráð við Orkuráðið og Almannastovuna.

§ *10.* Landsstýrið kann gera reglugerð um fyrisitingina sambært hesi lóg, og herundir áleggja Húsalánsgrunninum, Orkuráðnum og Almannastovuni skyldur, sum hesi annars ikki hava.

2. stk. Landsstýrið kann eftir tilmæli frá Orkuráðnum og í samráð við Húsalánsgrunnin og Almannastovuna gera tekniskar reglugerð um bjálvingartiltøk. Slík reglugerð er bindandi fyri tey fólkini, sum nevnd eru í § 8, 1. stk.

huset af »Húsalánsgrunnurin« sædvanlige vurderingsmænd, eller, såfremt sådanne er beskikket, særligt isoleringskyndige personer.

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte personer vurderer behovet for isoleringsforanstaltninger, opstillet i rækkefølge efter behovet sammen med udgiftsoverslag for hver enkelt foranstaltning.

Stk. 3. Udbetaling af isoleringstilskudslånet er betinget af, at de i stk. 1 nævnte personer har attesteret, at isoleringen er udført i overensstemmelse med gældende regler.

Stk. 4. Såfremt vedkommende pensionist selv, helt eller delvis udfører selve arbejdet med isoleringen, kan dette ikke medregnes i udgifterne.

§ *9.* Bortset fra de tilfælde, hvor Almannastovan træffer afgørelse, administreres denne lov af »Húsalánsgrunnurin«, om nødvendigt i samråd med »Orkuráðið« og »Almannastovan«.

§ *10.* Landsstyret kan fastsætte et regulativ om administrationen ifølge denne lov og herunder pålægge »Húsalánsgrunnurin«, »Orkuráðið« og »Almannastovan« pligter, som de ellers ikke har.

Stk. 2. Landsstyret kan efter indstilling fra »Orkuráðið« og i samråd med »Húsalánsgrunnurin« og »Almannastovan« fastsætte et teknisk regulativ om isoleringsforanstaltninger. Et sådant regulativ er forpligtende for de i § 8, stk. 1, omhandlede personer.

§ *11.* Í figgjarárinum 1982/83 og fylgjandi 4 figgjarár til og við figgjarárinum 1986/87 verða árliga á figgjarløgtingslógini avsettar 3 milj. kr. til Bjálvingarstuðulslánsgrunnin, sum verður fyrisitin av Húsalánsgrunninum. Peningur, sum kemur inn sum rentur og avdráttir, fer í Bjálvingarstuðulslánsgrunnin.

2. stk. Tá Almannastovan hevur játtað bjálvingarstuðulslán, og treytirnar sambært § 8 annars eru loknar, kann Húsalánsgrunnurin eftir samráð við Almannastovuna til útreiðslurnar til byggikredit í banka ella sparikassa, samanber § 7, játta eykalán, sum útgoldið verður, meðan bjálvingin verður gjørd, til bjálvingarstuðulslánið verður útgoldið.

§ *12.* Avgerðir, sum liknar eru sambært hesi lóg, kunnu innan fýra vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ *13.* Henda lóg fær gildi 1. apríl 1982.

§ *11.* I finansåret 1982/83 og følgende 4 finansår til og med finansåret 1986/87 afsættes hvert år på lagtingsfinansloven 3 mill. kr. til Isoleringstilskudslånefonden, der administreres af »Húsalánsgrunnurin«. Beløb, der indgår som afdrag og renter, tilskrives Isoleringstilskudslånefonden.

Stk. 2. Når »Almannastovan« har bevilget isoleringstilskudslån til betingelserne ifølge § 8, stk. 1 og 2 iøvrigt er opfyldt, kan »Húsalánsgrunnurin« efter samråd med »Almannastovan« til udgifterne til byggekredit i bank eller sparekasse, jævnfør § 7, bevilge et tillægslån, som udbetales, medens isoleringen udføres, indtil isoleringstilskudslånet udbetales.

§ *12.* Afgørelser, der er truffet i medfør af denne lov, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ *13.* Denne lov træder i kraft den 1. april 1982.

Viðmerkingar:

Tann 6. apríl 1981 gjørdi løgtingið í løgtingsmáli nr. 17/1980 (vetrarting): Brennistudningur til pensionistar, hesa samtykt:

»Vísandi til løgtingsmál nr. 80/1979 áleggur løgtingið landsstýrinum áðrenn 1. november 1981 at leggja fram lógaruppskot um stuðul til bjálving av húsum hjá pensiónistum«.

Sjálvt løgtingslógaruppskotið var klárt at leggja fyri tingið, tá hetta kom saman aftur í november 1981, men landsstýrið metti, at framløgan átti at bíða eftir úrslitinum av teirri kanning, sum Orkuráðið hevur gjørt av bjálvingartørvinum fyri hús hjá pensiónistum, so hetta úrslitið kundi verða latið tinginum sum skjal til løgtingsmálið, sí hjáløgdu frágreiðing »Bjálving og tetting 1. Hús hjá pensiónistum«.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Til § 1: Í nógvum førum eru brúksviðurskiftini nógv øðrvísi enn ognarviðurskiftini

og so statt er neyðugt, at ognarviðurskiftini eru upplýst.

Tí er eisini sett sum treyt, at talan er um egin hús, og er hetta at skilja heilt formliga, t.v.s. eigari sambært tinglesing.

Lagt kann verða afturat, at henda regla kanska kann virka til, at tinglisnu ognarviðurskiftini samsvara við teimum veruligu.

3. stk. heimilar Almannastovuni at gera frávik, tá óvanlig viðurskifti taka seg upp.

Til § 2: So leingi pensiónisturin er á lívi og býr í húsinum skal viðkomandi einki gjalda.

Harafturat koma ásetingar um eina líknandi støðu hjá øðrum.

Orðingin í 3. stk. ber í sær, at lánið sum megintregla verður at avdraga og renta, tá tann longstlivandi í pensiónistahjúnalagnum andast.

4. stk. fevnir um tann — heldur óhugsandi — møguleika, at eitt fólk heldur uppat at vera pensiónistur.

Til § 3: Í 2. stk. er umrøddur tann ógvuliga vanligi og týdningarmikli spurningurin, hvar fólk veruliga búgva. Eingin betri loysn er, enn at lata Almannastovuna gera av í hvørjum einstøkum føri.

Til § 4: Tá byrjað skal verða at gjalda rentur og avdráttir verður gjaldingin heft at teimum reglum, sum Húsalánsgrunnurin nýtir fyri til- og umbyggingarlán. Tey eru í løtuni annuitetslán yvir 15 ár til 8% í rentu.

Til § 5: Ætlanin er ikki, at einhvør pensiónistur skal eiga rætt til bjálvingarstuðulslán. Vart skal gerast við, at eitthvørt fólk yvir 67 ár — uttan mun til fíggjarlig viðurskifti — er fólkapensiónistur, um bert formlig umsókn er send Almannastovuni. 2. og 3. stk. miða ímóti at avmarka veitingina soleiðis, at lán ikki verður veitt, tá veruligur tørvur ikki verður mettur at vera.

Til § 7: Her er skotið upp, at lán kann veitast til kanning og eftirlit (um serligt gjald verður fyri hetta), tinglesing og byggirentur út yvir 20.000 kr. til sjálva byggingina.

Til § 8: Orkuráðið mælir til, at byggikøn fólk fáa serligan kunnleika til bjálving, og skulu hesi gera neyðugar kanningar og hava eftirlit við bjálvingararbeiðinum.

Til § 9: Skotið verður upp at býta arbeiðið við bjálvingarstuðulslánum, so at Almannastovan tekur avgerð um rættin til lán og annað, sum hoyrir saman við hesum, meðan roknskapur, eftirlit og tinglesing v.m. verður latin Húsalánsgrunninum upp í hendi.

Til § 10: Í fyrisitingarreglugerðini ætlar landsstýrið at áseta, at Húsalánsgrunnurin og Almannastovan kunnu steðga viðgerð av málum, tá stórt tal av lánunum er játtað.

Tá landsstýrið fær boð um hetta, verður at umhugsa øking av peninginum, sum er til taks til bjálvingarstuðulslán.

Orkuráðið arbeiðir við at savna tilfar, ið kann nýtast til vegleiðingar, um best hóskandi bjálving av ymiskum húsasløgum.

Til § 11: Skotið verður upp, at skipanin verður gjørd sum grunnur, ið verður »revolverende«, av ti at rentur og avdráttir, sum fara at koma inn, kunnu nýtast til nýggj bjálvingarstuðulslán.

Til § 13: At lógin fær gildi 1. apríl 1982 ber í sær, at umsóknir ikki kunnu latast inn fyrr enn 1. apríl 1982.

Sí skjal 15

1. viðgerð 17. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og varð til 1. viðgerð hin 17. mars 1982 beint í sosialu nevndina.

Ætlanin er at veita stuðulslán til pensiónistar við egnum húsum úr einum revolverandi stuðulslánsgrunni. Lánini verða veitt móti tingslisnum veð í húsunum og verða ikki niðurskrivað uttan tá ið goldið verður.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó mælir ein meiriluti (Jógvan Sundstein, Karin Kjølbro, Eli Nolsøe og Sverre Midjord) til at tað einstaka lánið kann maximalt verða kr. 25.000, og setir fram hetta

BROYTINGARUPPSKOT

Í § 7 verða »kr. 20.000« broytt til »kr. 25.000«.

2. viðgerð 23. apríl. Broyting frá meiriluta í sosialu nevndini til § 7 varð samtykt við 31-0, §§ 2-13 samtyktar við 31-0.

3. viðgerð 23. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

L.L.j.nr. 1010-21-1 Lóg nr. 87 frá 1. juni 1982.

128. Broyting í innflutningsgjøldum.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í innflutningsgjøldum.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinri broytingum verður í § 8, seinasta punktum sett inn aftaná »rávøru« »og pakkitilfar«.

§ *2.* Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Føroyar og Felagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i indførselsafgifter.

§ *1.* I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer indsættes i § 8 sidste punktum efter »råvarer« »og emballage«.

§ *2.* De i lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Galdandi regla um afturrindan av goldnum tolli ella gjaldfrían innflutning av rávøru til virkir, sum broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 9. september 1981 um broytingar í innflutningsgjøldum heimilar ikki nevndu rættindi til virkir fyri pakkitilfar.

Grundgevingin er lógfrøðisliga sæð, at pakkitilfar sum so ikki er ein rávøra sum liður í vøruframleiðslu, men ein innbjálving, innpakking ella innballing av liðugtgjørdu vøruni. Tó er undantaksregla í § 2, punkt 5, í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald. (»Ílat og tilfar til pakkingar av fiski og síld, sum t.d. kassar til fisk o.s.fr.).

Pakkitilfar ella emballaga er í dag ein týðandi kostnaður fyri fleiri virkir, ið fáa lætta eftir § 8 í tollógini, og fyri hesi er umráðandi at fáa fótin fastan ella fastari í okkara heimliga søluumarknað, og sum ein stuðul í hesi strembanini mælir landsstýrið til, at reglan í § 8 verður víðkað sum tilskilað í lógarupsskotinum. Í løtuni eru eingi

samlað hagtøl viðvikjandi innflutningi av lí pakkitilfari tøk, ið verða umfatað av ætlaðu broytingini í § 8, men leysliga verður mett, at innflutningsvirðið er minni enn 1 mió. kr.

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 1. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 19. mars beint í figgjarnevndina.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Atli P. Dam, Ove Mikkelsen, Annfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 15. apríl. Málið varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

3. viðgerð 19. apríl. Uppskotið samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. Lóg nr. 64 frá 6. mai 1982.

---

129. Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar.

lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister og enlige forsørgere.

§ *1.* Í figgjarárinum 1982/83 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensjónistar við kr. 1.200 til hvønn pensjónist.

§ *2.* Brennistudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1981 hava fingið játtað fólkapensjón, avlamispensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er uppnáddur og seinri fáa pensjónina játtaða.

§ *3.* Treytin fyri at fáa brennistudning er, at pensjónisturin við oktober útgjaldingina 1981 hevur rætt til pensjónsviðbót. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar eiga ein part í felag.

§ *4.* Í figgjarárinum 1982/83 verður úr landskassanum eisini veittur ein brennistudningur við kr. 1.200,- til stakar uppihaldarar við egnum húsarhaldi, sum fáa hjálp samsvarandi § 22 í forsorgarlógini.

§ *5.* Brennistudningurin verður útgoldin av Føroya Gjaldstovu.
2. stk. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
3. stk. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

§ *6.* Brennistudningurin er ikki skattskyldugur.

§ *7.* Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1982.

§ *1.* I finansåret 1982/83 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på kr. 1.200 til hver pensionist.

§ *2.* Brændselstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1981 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået og senere får pensionen bevilget.

§ *3.* Betingelsen for at opnå brændselstilskud er, at pensionisten ved oktober udbetalingen 1981 er berettiget til pensionstillæg. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ *4.* I finansåret 1982/83 ydes af landskassen også et brændselstilskud til enlige forsørgere med egen husholdning, som får hjælp ifølge § 22 i forsorgsloven.

§ *5.* Brændselstilskudet udbetales af Føroya Gjaldstova.
Stk. 2. Iøvrigt varetager Almannastovan administrationen af brændselstilskudet.
Stk. 3. Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

§ *6.* Brændselstilskudet er ikke skattepligtigt.

§ *7.* Denne lov får virkning fra 1. april 1982.

Viðmerkingar:

Í figgjarárinum 1980/81 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við kr. 900,- til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í figgjarárinum 1981/82 er brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við 1.200 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í figgjarárinum 1981/82 er sambært løgtingslóg nr. 78 frá 11. december 1981 um brennistudning til stakar uppihaldarar brennistudningurin eisini veittur støkum uppihaldarum við egnum húsarhaldi, sum fáa hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

Landsstýrið metir, at tørvur er á, at sami brennistudningur, sum er veittur ávísum pensjónistum og ávísum støkum uppihaldarum í figgjarárinum 1981/82, verður veittur í figgjarárinum 1982/83.

1. viðgerð 17. mars. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum, og varð við 1. viðgerð hin 17. mars 1982 beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við hesum broytingum:

Í § 1 verður »1981/82« broytt til »1982/83«.
Í § 1 verður »kr. 1.200« broytt til »kr. 1.350«.
Í § 3 verður »1981« broytt til »1982«.

Frederik Olsen tekur ikki undir við hækkingini av upphæddini.
Eli Nolsøe og Jógvan Sundstein fráfalla uppskotið um hækking av upphæddini.

2. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskot frá nevndini pkt. 1 til § 1, pkt. 3 til § 3 samtykt við 32-0. Broytingaruppskot frá minniluta í nevndini til § 1 fall við 15-0. Landsstýrisuppskotið § 1 samtykt við 32-0, §§ 2-7 samtyktar við 32-0.

3. viðgerð 23. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1010-20-1 Lóg nr. 79 frá 21. mai 1982.

130. Sínámillum fiskiskapur av svartkjafti Føroyar - Ísland í 1982.

Ár 1982, friggjadagin 12. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 10. mars millum Føroyar og Ísland um sínámillum fiskiskap av svartkjafti í 1982.

Viðmerkingar:

Samband hevur verið ímillum umboð fyri Føroya landsstýri og umboð fyri íslendsku stjórnina um framhald av sínámillum fiskiskapi av svartkjafti í 1982.

Partarnir eru samdir um eina skipan fyri 1982, sum er váttað við brøvum og telexum frá báðum pørtum dagfest 10. mars 1982 sambært skjølini 1 og 2.

Sambært hesa skipan kunnu íslendingar og føroyingar fáa loyvi til at veiða upp til 20.000 tons av svartkjafti á fiskiøkinum hjá hvørjum øðrum.

Eitt av teimum føroysku skipunum, ið fær loyvi at veiða svartkjaft á íslendska búskaparøkinum, fær eisini loyvi til at viðgera hann um borð.

Partarnir eru eisini samdir í, at nærri skipanir um svartkjaftaveiðuna verða avtalaðar beinleiðis millum føroyskar og íslendskar fiskimyndugleikar, og at reglurnar um sínámillum fiskirættindi sambært avtaluna frá 10. januar 1979 um fráboðanarskyldu v.m. annars verða fylgdar.

Leggjast kann aftrat, at avtalan um føroyska botnfiskiveiðu við Ísland heldur fram, inntil annar av pørtunum ynskir hana uppsagda ella broytta við 6 mánaða ávaring.

Eisini í 1980 varð avtalan um svartkjaftaveiðu gjørd við bræva- og telexskifti.

81235 tingns fa
2225 extern is

reykjavik, 10.3.1982

hr. arni olafsson
foeroya landsstyri
torshavn

med visan til simtals okkar i dag kemur hjer eftirfarandi skeyti. — kvedjur, hannes hafstein

hr. loegmaður,

jeg hef i dag sent ydur eftirfarandi brjef og vaeri aeskilegt ad fa telex-svar við thvis eins fljott og unnt er og sidan skriflegt svar i framhaldi av thvi:

»reykjavik, 10. mars 1982

hr. loegmaður,

jeg leyfi mjer ad bera fram tilloegu thess efnis ad veittar verdi gagnkvaemar heimildir til veida a 20 thusund lestum av kolmunna innan fiskiveidiloegsoegu faereyja og efnahagsloegsoegu islands a arinu 1982. heimild thessi naer einnig til veida skips er baedi veidir aflann og vinnur hann um bord. um nanara fyrikomulag thessara veida verdur haft beint samband milli islendska sjavarutvegsraduneytisins og landsstjornar faereya. ad oedru leyti mun fylgt thvi fyrirkomulagi og reglum sem akvedid var i vidraedum um gagnkvaemar fiskiveidiheimildir islendinga og faereyinga sem undirritadar voru 10. januar 1979.

ef thjer fallist a ofangreint, hr. loegmadur, bid jeg um stadfestingu ydar thar ad lutandi.

olafur johannesson«

med bestu kvedjum,
olafur johannesson

hr. pauli ellefsen, loegmadur
foeroya landsstyri
torshavn

torshavn, 10.3.1982

uttanrikisraduneytid
reykjavik

hr. hannes hafstein

visandi til telefonsamrødu okkara i dag og til telex fra tykkum, verdur hervid sent aftursvar okkara:

harra uttanrikismalaradharri.

eg havi i dag fingid telex av brævi tygara fra i dag um framhald i 1982 av sinamillum fiskiskapi eftir svartkjafti millum føroya og islands, og havi sent tygum soljodandi svarbræv:

»torshavn, 10. mars 1982

harra uttanrikismalaradharri.

vist verdur til bræv tygara fra i dag har id skotid verdur upp at islendingar og føroyingar i 1982 faa loyvi til at veida upp til 20.000 tons av svartkjafti a fiskiøkinum hja hvørjum ødrum i 1982, og at eitt av teimum føroysku skipunum, id far loyvi at veida svartkjaft a islendskum øki, eisini far loyvi til at vidgera hann umbord.
vegna føroya landsstyri kann eg svara, at vit eisini ynskja eina slika skipan, og at vit eru samdir i at nærri fyriskipanir um hesa veidu ciga at verda avtaladar beinleidis millum føroyskar og islendskar fiskimyndugleikar, og at tær reglur, id avtaladar voru i samrødum um sinamillum fiskiveidirættindi føroyinga og islendinga millum 10. januar 1979 annars verda fylgdar.

l.v.
pauli ellefsen, løgmadur«

vid bestu heilsum
pauli ellefsen.

vidari mannagongdin i føroyum verdur tann, at landsstyrid leggur uppskot um godkenning av omanfyri umrøddu skipan fyri løgtingid. so skjott sum løgtingsvidgerdin er fullførd verdur landsstyrid at boda uttanrikisraduneytinum fra hesum.

vinarliga
arni olafsson
skrivstovustjori
føroya landsstyri

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 12. mars og undir 1. viðgerð 19. í sm. m. beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti

landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 29. mars. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-2-4-3.

---

131. Skipan millum Føroyar og Svøríki um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Ár 1982, friggjadagin 12. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar.

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 8. mars 1982 millum Føroyar og Svøríki um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Viðmerkingar:

Síðani 1977 hevur fyri eitt ár í senn loyvi verið givið svenskum skipum at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya.

Skipanin fyri 1981 (løgtingsmál nr. 52/1980) bar í sær, at 2 svensk fiskifør uttan nøgdaravmarking fingu loyvi at veiða svartkjaft undir Føroyum.

Afturfyri góvu sviar 4 føroyskum skipum loyvi at veiða 700 tons av toski í svenskum sjógvi í Eystrasalti.

Tvey tey seinastu árini hava sviar ikki gjørt brúk av hesum loyvunum, meðan føroyingar hava veitt kvotuna upp.

Samband hevur verið ímillum umboð fyri landsstýrið og umboð fyri svensku myndugleikarnar um framhald av sínámillum fiskiskapinum í 1982.

Partarnir eru samdir um eina skipan fyri 1982, sum er váttað við telexi dagfest 26. februar 1982 frá Føroya landsstýri til Jordbruksdepartementet, Stokholm og telex dagfest 8. mars 1982 frá Jordbruksdepartementet til Føroya landsstýri, sambært skjal 1 og skjal 2.

Sambært hesa skipan kunnu 2 svensk linuskip fáa loyvi at veiða 200 tons (ósløgd vekt) av longu í føroyskum sjóøki.

Afturfyri kunnu 4 føroysk fiskifør á svenskari fiskileið í Eystrasalti veiða 400 tons av toski.

landsstýrið hevur d.d. sent soljóðandi telex:

quote

torshavn, den 26. februar 1982

jordbruksdepartementet
stockholm.

f.l.j.nr. 1500-1-11-7 føroyar/svøriki.

att. fuldmægtig tore gustafsson.

vedr. indgåelse af en aftale om fortsat gensidigt fiskeri færøerne/sverige i 1982.

under henvisning til telefoniske drøftelser med svenske fiskerimyndigheder, senest telefonsamtale af d.d. med fuldmægtig tore gustafsson i jordbruksdepartementet, skal man fra landsstyrets side bekræfte, at man er indstillet på at gennemføre følgende arrangement for gensidigt fiskeri mellem færøerne og sverige i 1982:

svensk fiskeri i færøernes fiskerizone:

færøernes landsstyre vil være villigt til at udstede fiskerilicens til 2 svenske langline fartøjer til fiskeri af lange i færøernes fiskerizone inden for en kvote på 200 tons rund vægt.

færøsk fiskeri i svensk zone:

svenske fiskerimyndigheder vil udstede fiskerilicenser til 4 færøske fartøjer til fiskeri af torsk i svensk zone i østersøen inden for en kvote på 400 tons rund vægt.

færøernes landsstyre anmoder herved de svenske fiskerimyndigheder om bekræftelse af ovenstående aftale.

aftalen indgås fra landsstyrets side med sædvanligt forbehold om lagtingets godkendelse. landsstyret vil, så snart ovenstående er bekræftet fra svensk side, tage

skridt til at forelægge laglinget aftalen og vil give de svenske myndigheder besked om lagtingets stillingtagen, så snart denne foreligger.

for færøernes landsstyre
arni olafsson, kontorchef

unquote

81235 tingns fa
81225 rigsom fa

1322

81235 tingns fa
81235 tingns fa
114 loendej s

1982-03-08 nr. 55

foer kontorchef arni olafsson
faeroearnas landsstyre

oemsesidigt fiske sverige/foeroerarna under 1982

faar naermed bekrafta ditt telex av den 26 februari 1982.
de svenska fiskeraettigheterra i faeroeisk zon skall utgoeras av 2 fartygslicenser foer laanga upp till en kvot av 200 ton rund vikt.
de faeroeiska fiskeraeetigheterna skall utgoeras av 4 fartygslicenser for torsk i svensk zon i oestersjoen utanfoer tolv nautiska mil fraan baslinjen upp til en kvot av 400 ton rund vikt.
fraan svensk sida kan detta avtal saettes i kraft med kort varsel.

tore gustavsson
jordbruksdepartementet

81235 tingns fa
1146l loendep s

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av landsstýrinum 12. mars 1982 og undir 1. viðgerð 19. mars beint í marknaðarnevndina.

Samd nevnd tók undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 29. mars. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-11-7.

---

132. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Ár 1982, friggjadagin 12. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar.

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 25. september 1981 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1982.

Viðmerkingar:

Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínámillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri 1 ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingarnar um eina slíka avtalu fyri sínámillum fiskiskap í 1982 vóru í Moskva 24. - 26. september 1981, og samdust partarnir um viðløgdu skipan við seinri broytingum, sambart skjal 1 og 2.

Sambært avtaluna fáa føroysk skip loyvi til í sovjetiskum sjógvi at veiða 14.000 tons av toski, íroknað hjáveiðu av hýsu og øðrum botnfiski. Av hesum kunnu

11.000 tons veiðast í Barentshavinum, harav kunnu 1.000 tons veiðast í teimum pørtunum av Barentshavinum, sum liggja úti fyri sovjetisku strondina, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttanfyri 12 fjórðingar, 5.000 tons í sovjetisk-norska felagsøkinum, ti sonevnda »blandaða« ella »gráa økinum«. 3.900 tons kunnu veiðast í norska partinum av Barentshavinum, treytað av góðkenning frá norsku myndugleikunum, sum er fingin sambært løgtingsmál nr. 91/1981: Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1982. Tey frestandi 1.100 tonsini kunnu veiðast á sovjetiskari fiskileið, annaðhvørt í Eystrasalti ella í Barentshavinum, alt eftir ti føroyingar halda tørv verða á.

Í Eystrasalti, í teimum pørtunum, ið liggja út fyri sovjetisku strondina, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar, verður loyvt at veiða 3.000 tons (ávikavist 4.100) av toski, íroknað hjáveiðu av øðrum botnfiski.

Føroysk skip kunnu harnæst veiða 20.000 tons av lodnu í Barentshavinum.

Afturfyri verður loyvt russiskum skipum at veiða á sjóøki Føroya 95.000 tons av svartkjafti til matna.

Frá sovjetiskari síðu verður eingin avmarking ásett fyri talið av føroyskum fiskiførum.

Frá føroyskari síðu verður talið av sovjetiskum fiskiførum í svartkjaftaveiðuni avmarkað til 14 í tíðarskeiðinum januar-september, og 8 í tíðarskeiðinum oktober-december.

Partarnir samdust um í 1982 at halda fram við sínámillum royndarfiskiskapinum. Føroyskum skipum verður loyvt at reka royndarfiskiskap eftir rækjum í russiskum sjógvi.

3 sovjetisk skip kunnu samstundis fáa loyvi at gera royndarfiskiskap í føroyskum sjógvi, djúpri enn 700 m. Loyvt verður einum av fyrrnevndu 3 skipum at reka djúphavsroyndarfiskiskap íroknað dýpið millum 500-700 metrar rundan um Ytra Bailey Banka, tó so at samlaða veiðan av botnfiski hægst skal vera 200 tons.

Royndarfiskiskapur skal fremjast sambært fiskiætlanum, sum partarnir skulu siga hvørjum øðrum frá frammanundan.

Áhugi var fyri nærri vísindaligum samstarvi og í hesum sambandi luttóku í millumlanda samstarvi viðvíkjandi svartkjafti.

Loyvt verður 1-2 sovjetiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli á føroyskum fiskiøki, undantikin stongd øki, í tíðarskeiðinum mai-september 1982. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða makrelveiðan skal ikki fara upp um 2.000 tons.

Fyri allan royndarfiskiskapin á føroyskum øki er galdandi, at føroyingar kunnu seta sínar serfrøðingar umborð á sovjetisku skipini.

SJÓVINNUMÁL. 16.

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 12. mars 1982 og undir 1. viðgerð 19. mars beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan I. Olsen, Jørgen Thomsen, Svend Åge Ellefsen) tók undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Petur Reinert) tók ikki undir við uppskoti landsstýrisins og hevur hesar viðmerkingar:

Sambært sáttmálanum verður loyvt føroyskum skipum at veiða samanlagt 17.000 tons av toski og 20.000 tons av lodnu í sovjetiskum sjógvi og sovjetiskum skipum at veiða 95.000 tons av svarikjafti til matna í føroyskum sjógvi.

Rokna vit útflutningsvirðið av tí, ið henda veiði okkara í sovjetiskum sjógvi kann kasta av sær, verður tað samanlagt umleið 130 mió. kr. Har aftur í móti kemur, at virðið av teimum 95.000 tonsunum, ið sovjetmonnum loyvist at veiða í okkara sjógvi, virkað til matna, verður um leið 230 mió. kr.

Hetta býtið verður tá roknað í peningsvirði Sovjetsamveldinum 100 mió. kr. til fyrimunar. Slíkt býti kann minnilutin ikki góðtaka, og má tað haldast vera beinleiðis í stríð við tann rammusáttmála, ið vit hava við Sovjetsamveldið, har tað eins og í øðrum rammusáttmálum okkara verður roknað við javnbýti millum londini og ikki slíkum vanbýti okkum til tap, sum inniheldst í hesum sáttmála. Minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) mí tí mæla tinginum frá at samtykkja henda sáttmálan.

2. viðgerð 29. mars. Uppskotið varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1500-4-39.

---

133. Søla av gomlu sildaverk-smiðjuni í Kollafirði.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
TIL

løgtingslóg um sølu av gomlu sildaoljuverksmiðjuni í Kollafirði.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at selja matr. nr. 229 í Kollafirði við bygningum.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om salg af den gamle sildeoliefabrik i Kollafirði.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at sælge matr. nr. 229 i Kollafjørður med bygninger.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1978, Løgtingstíðindi bls. 188, mál nr. 52, legði landsstýrið hetta lógaruppskotið um sølu av gomlu sildaverksmiðjuni í Kollafirði fyri løgtingið.

Málið varð við 1. viðgerð 30. januar 1980 beint í figgjarnevndina, men er ikki komið aftur frá nevndini.

Landsstýrið endurnýggjar við hesum lógaruppskotið og vísir til viðmerkingarnar í Løgtingstíðindi 1978.

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 30. mars legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 19. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Ein samd figgjarnevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 31. mars. § 1 varð samtykt við 27-0 atkvøðum, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 19. apríl. Uppskotið samtykt við 31-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1508-7. Lóg nr. 75 frá 21. mai 1982.

134. Verja móti oljudálking.

Árið 1982, fríggjadagin 12. mars legði Juul Jacobsen, løgtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um skyldu at móttaka spillolju.

§ *1.* Ein og hvør oljuseljari í Føroyum hevur skyldu til uttan samsýning at taka ímóti spillolju frá kundum sínum, og á tryggjandi hátt syrgja fyri at tílík olja ikki verður til ampa fyri føroysku náttúruna.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om pligt til at modtage spildolie.

§ *1.* Alle oliesælgere på Færøerne har pligt til uden vederlag at modtage spildolie fra sine kunder og på betryggende måde at sørge for at sådan olie ikke bliver til ulempe for den færøske natur.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað er ikki so sjáldan at siggja stórar oljuflakar rekast kring oyggjarnar og stundum upp á land. Ein av orsøkunum er at einki ávíst er fyriskipað um hvat skal gerast við spillolju.

Tá skip koma inn í fremmandar havnir at taka olju umborð er vanligt, at oljuseljarin tekur ímóti innhaldinum í spilloljutanganum og/ella spilloljuføt.

Hóast fjarskotnir eiga vit eftir førimuni at ansa eftir at náttúran ikki verður dálkað og at altjóða reglur um forboð móti dálking av havinum verða yvirhildnar.

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av Framburðs- og Fiskivinnuflokkin um og undir 1. viðgerð tann 19. mars 1982 beint í umhvørvisnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Anfinn Kallsberg, Petur Reinert, Guttorm Klein og Vilhelm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Meirlutin er av teirri áskoðan, at í eini komandi umhvørvislóg eiga ásetingar at

verða gjørdar viðvíkjandi oljudálking, og verður í hesum sambandi vist til álit nevndarinnar í løgtingsmáli nr. 23/1981. Sostatt setir meirlutin einki uppskot fram í hesum máli.

Ein minniluti (Ivan Johannesen) tekur ikki undir við uppskotinum, men vísir til ríkislóg nr. 70 frá 28. mars 1956 »om foranstaltninger mod olieforurening af havet«, sett í gildi í Føroyum við Anordning nr. 233 frá 21. juni 1958 við seinni broyting.

2. viðgerð 24. apríl, § 1 fall við 2-0. Uppskotið sostatt burturfallið.

F.L.j.nr.937-2.

---

135. Stovnan av Trygdargrunni landskassans.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Framburðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um stovnan av Trygdargrunni Landskassans.

§ *1.* Settur verður á stovn grunnur, nevndur Trygdargrunnur Landskassans.
2. stk. Endamál grunnsins er at tryggja landskassan móti figgjarligum bakkøstum.

§ *2.* Grunnurin verður umsitin av Føroya Gjaldstovu og stjórnaður av eini 5-manna nevnd vald soleiðis:
4 av Føroya Løgtingi og
1 av Føroya Landsstýri og er hesin formaður.

lagtingslov om oprettelse af Landskassens Sikringsfond.

§ *1.* Der oprettes en fond ved navn »Trygdargrunnur Landskassans«.
Stk. 2. Fondens formål er at sikre landskassen mod financielle tilbageslag.

§ *2.* Fonden administreres af Færøernes Oppebørselskontor og bestyres af et udvalg på 5 medlemmer, der vælges således:
4 af Færøernes Lagting,
1 af Færøernes landsstyre og er denne formand.

2. stk. Nevndin ger reglugerð fyri grunnin, og skal reglugerðin góðkennast av Føroya Landsstýri.

§ *3.* Grunnurin fær sínar inntøkur á tann hátt, at teir føroysku lánstovnar, sum læna móti landskassaveðhaldi, skulu gjalda eitt avgjald til grunnin av øllum útlánum við landskassa veðhaldi, svarandi til 1/5 av tí rentu lánstovnurin tekur fyri viðkomandi lán.

2. stk. Landsstýrið avger, um almennir lánsstovnar koma undir hesa lóg.

3. stk. Tað er bannað lánstovni at taka hægri rentu fyri lán við landskassaveðhaldi enn fyri onnur tilsvarandi lán.

§ *4.* Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1982.

Stk. 2. Udvalget udfærdiger vedtægter for fonden og skal vedtægten godkendes af Færøernes landsstyre.

§ *3.* Fonden får sine indtægter på den måde, at de færøske låneinstitutter, der låner ud mod landskassekaution, skal betale en afgift til fonden af alle udlån med landskassekaution, der svarer til 1/5 af den rente, låneinstitutter tager for vedkommende lån.

Stk. 2. Landsstyret afgør, om offentlige låneinstitutter skal omfattes af denne lov.

Stk. 3. Det er forbudt låneinstitutter at kræve højere rente for lån med landskassekaution end for andre tilsvarende lån.

§ *4.* Denne lov træder i kraft 1. april 1982.

Viðmerkingar:

Landskassin, og harvið føroyski borgarin veðheldur fyri so nógvum milliónum kr. hjá føroysku lánsstovnunum, at tað kann fáa katastrofalar fylgjur fyri landskassan, um ein av lánstovnunum fer av knóranum eins og fyrst í fimtiárunum.

Lánstovnarnir seta vanliga í grunnar, at standa ímóti tapi við, fittan part av rentuinntøkuni. Hóast null risiko, har landskassin veðheldur, verður sama renta avtikin av hesum lánum.

Fer ein fyritøka við landskassaveðhaldi av knóranum, fær viðkomandi lánsstovnur 100% endurgjald fyri tap frá landskassanum. Av sama láni kunnu vera settar til síðis, í grunnar at standa ímóti við, stórar upphæddir.

Við tað at lánsstovnarnir av tílíkum lánum onga risiko loypa og fáa bæði í posa og sekk, má tað metast rætt og rímiligt at ca. 1/5 av tí rentu, lánsstovnurin tekur fyri landskassaveðhildin lán, fer í ein trygdargrunn fyri landskassan.

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 1. apríl legði fram soljóðandi.

ÁLIT

Málið varð framlagt av Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum og við 1. viðgerð 19.

mars 1982 beint í løganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og setir ein meiriluti (Guttorm Klein, Edmund í Garði og Agnar Nielsen) einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jona Henriksen og Petur Reinert) heldur, at málið kann loysast við at seta landsbankan á stovn.

2. viðgerð 20. apríl. § 1 fall við 2-0. Málið sostatt burturdoturið.

---

136. Stovnan av føroyskum skipasýni.

Ár 1982, fríggjadagin 12. mars legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður vegna Fram burðs- og Fiskivinnuflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um stovnan av føroyskum skipasýni.

§ *1.* Landið yvirtekur føroyadeildina av Statens Skibstilsyn frá 1. apríl 1982 at rokna.

2. stk. Tær reglur, lógir og kunngerðir, sum føroyadeildin av Statens Skibstilsyn higartil hevur arbeitt eftir, verða at galda fyri føroyska skipasýnið til føroyskar reglur, lógir og kunngerðir eru settar í gildi á hesum øki.

§ 2. Øll í Føroyum skrásett skip yvir 5 brt. skulu til føroyska skipasýni gjalda eitt árligt gjald uppá kr. 30,00 pr. brt.

lagtingslov om etablering af færøsk skibstilsyn.

§ *1.* Landet overtager færøafdelingen af Statens Skibstilsyn fra 1. april 1982 at regne.

Stk. 2. De bestemmelser, love og bekendtgørelser, som færøafdelingen af Statens Skibstilsyn hidtil har arbejdet efter, bliver fortsat gældende for det færøske skibstilsyn, til færøske bestemmelser, love og bekendtgørelser sættes i kraft på dette område.

§ 2. Alle på Færøerne registrerede skibe over 5 brt. skal betale en årlig afgift til det færøske skibstilsyn på kr. 30,00 pr. brt.

2. stk. Gjald sambært 1. stk. fellur til gjaldingar 1. apríl, fyrstu ferð 1. apríl 1982.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1982.

Stk. 2. Afgiften i henhold til stk. 1 forfalder til betaling 1. april, første gang 1. april 1982.

§ *3.* Denne lov træder i kraft 1. april 1982.

Viðmerkingar:

Tað er ikki hóskandi, at føroysku havgangandi skipini eru undirløgd donsku lógina um fiskiskip, við tað at donsku lógirnar eru gjørdar til skip, sum fiska í donskum sjógvi, Eystrasalti og Norðsjónum.

Mótvegis donsku fiskiskipunum so ferðast føroysku skipini um at kalla allan knøttin. Danskir lógar- og direktivsmiðir hava ikki tá neyðugu følingina við, hvat føroysk fiskiskip á altjóða leiðum eru útsett fyri.

Skipasýnið, sum umfatar fyrisiting, tilsýn, uppmáting, skráseting og dykkaralógina, kemur at kosta umleið 2,5 mill. kr. at reka.

Skipasýnið kann og eigur at verða stovnsett á ein tílíkan hátt, at tað ikki nervar figgjarlógina, men er sjálvbjargi. Hetta gerst við at áseta eitt avgjald uppá kr. 30,- pr. brt. pr. ár.

Arbeiðsuppgávurnar hjá maskin- og arbeiðseftirlitinum falla ofta saman við uppgávunum hjá skipasýninum, og er tað tí ein nærliggjandi tanki at sláa hesar tríggjar stovnar saman í ein stovn. Hetta má umhugsast beinanvegin, skipasýnið er vorðið føroyskt.

1. viðgerð 19. mars. Málið varð beint í lógarnevndina, sum legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki og við 1. viðgerð 19. mars 1982 beint í lóganevndina.

Undir 1. viðgerð av málinum vísti ríkisumboðsmaðurin á, at hetta málsøki hvørki stendur undir A ella B málum í heimastýrislógini og sostatt ikki kann yvirtakast beinleiðis.

Nevndin hevur viðgjørt málið og setir ein meiriluti (Guttorm Klein, Edmund í Garði, Agnar Nielsen og Jóannes Dalsgaard) einki uppskot fram.

Ein minniluti (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 23. apríl. Skotið varð upp at beina málið aftur í nevnd. Atkvøðugreiðsla um at málið ikki skuldi aftur í nevnd, hetta varð samtykt við 17-0. Uppskotið fall við 8-0 atkvøðum.

137. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

lagtingslov om garanti for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 25 mió. kr.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1982/83 at garantere for lån til fiskerskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25 mio. kr.

§ *2.* Treytirnar fyri at veðhald kann verða veitt eru hesar:

§ *2.* Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

1 At líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

1 At der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

II a) Har talan er um fiskavirkir, *at* eginpeningurin verður hækkaður við 10%. *At* kommunan ella kommununrnar veðhalda fyri í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, ella fingin verða onnur lán, sum ikki krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambært hesa lóg.

II a) Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder, *at* egenkapitalen forhøjes med 10%. *At* kommune eller kommunerne garanterer for mindst 15% af dette beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i denne lov.

II b) Har talan er um fiskiskip har partafelag er ognari, *at* eginpeningurin verður hækkaður við í

II b) Hvor talen er om fiskerskib, der tilhører aktieselskab, *at* egenkapitalen forhøjes med mindst

minsta lagi 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.

II c) Har talan er um fiskiskip har einstaklingur, partreiðarar ella líknandi eru ognarar, *at* inngoldin verður spardur skattur, sum stavar frá avskriving uppá skipið seinastu 5 árini, og *at* nýinngoldið verður 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.

§ *3.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Samstundis fer løgtingslóg nr. 7 frá 24. februar 1981 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir úr gildi.

10% af det beløb, der er nødvendigt til forsættelse af driften.

II c) Hvor der er tale om fiskerskib, der ejes af enkeltperson, partsrederi eller lignende, *at* der indbetales sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet de sidste 5 år, og *at* nyindbetalt bliver 10% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 7 af 24. februar 1981 om garanti for lån til fiskerskibe.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 7 frá 24. februar 1981 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir varð heimilað landsstýrinum saman við fíggjarnevndini at veðhalda fyri upp til 5 mió. kr.

Henda upphædd vísti seg at vera ov lítil, og samtykti løgtingið í december 1981 at hækka upphæddina við 10 mió. kr. Henda lóg fór úr gildi 31. december 1981.

Landsstýrið metir at tørvurin á kreppuláni einar 25 mió. kr., kanska meira, í komandi fíggjarári, eisini tí at heimildin at veita »serlán« eftir løgtingslóg nr. 8 frá 16. januar 1980 nú er uppbrúkt.

Eisini eru nakrar broytingar gjørdar í mun til undanfarnu kreppul Eisini eru nakrar broytingar gjørdar í mun til undanfarnu kreppulógir.

Har flakavirkir koma í kreppustøðu heldur landsstýrið, at kommunurnar, sum hava serliga áhuga fyri at hava virkið gangandi, skulu veðhalda fyri einum parti av lánunum.

Eisini heldur landsstýrið, at har skipacigari undir einum hevur havt skattligar fyrimunir við at avskriva uppá skip, eigur at verða kravt, at tann spardi skattapeningurin verður inngoldin til skipið. Við avskriving verður í hesum sambandi meint við avskriving í aðrari inntøku enn vinningi av skiparakstri. Fyri umsitingarliga at lætta um viðgerðina av komandi málum av hesum slagi, skal inngjaldið til felagið setast til 40% av gjørdum avskrivingum seinastu 5 árini í aðrari inntøku enn vinningi av skiparakastri. Endamálið við hesi reglu er at forða fyri, at spardur skattapeningur í samband við avskriving uppá skip fer til privata nýtslu. Um

skipaeigarin hevur goldið inn til skipið minst tað, sum spart er í samband við avskrivingina, fellur krav ið um inngjalding burtur.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 23. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Amfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við teirri broyting, at í § 2, II a verður setningurin um at kommunan ella kommununrnar veðhalda fyri í minsta lagi 15% o.s.fr., broytt til, at fingin verða onnur veðhald fyri í minsta lagi 15% o.s.fr., og í § 2, II b verður reglan um at í minsta lagi 10% av ti peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, broytt til, at í minsta lagi 10% av ti peningi, ið veittur verður sambært hesi lóg.

Nevndi meiriluti setir sostatt til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

broytingaruppskot

1) Í § 2, II a verður í staðin fyri *at* kommunan ella kommununrnar veðhalda sett: »og at fingin verða onnur veðhald«.
2) Í § 2, II b verður í staðin fyri »í minsta lagi 10% av ti peningi, ið neyðugur er til framhald av raksrinum« sett: »í minsta lagi 10% av tí veðhaldsupphædd, ið veitt verður sambært hesi lóg.«

1) I § 2, II a indsættes i stedet for *at* kommune eller kommunerne garanterer: »og at der tilvejebringes andre garantier«.
2) I § 2, II b indsættes i stedet for »med mindst 10% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften«: »med mindst 10% af det garantibeløb, der bevilges i henhold til denne lov.«

Ein minniluti (Jørgen Thomsen og Ove Mikkelsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins óbroytt, men mælir til at upphæddin 25 mió. kr. í § 1 verður sett til 15 mió. kr. og setir sostatt til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

broytingaruppskot

Í § 1 verður »25 mió. kr.« broytt til »15 mió. kr.«

I § 1 ændres beløbet »25 mio. kr.« til »15 mio. kr. «

Umframt setir nevndi minniluti fram soljóðandi lógaruppskot til løgtingslóg um skilabótalán fiskivinnunar:

UPPSKOT
til

løgtingslóg um skilabótalán fiskivinnunnar.

§ *1.* Landsstýrinum saman við fíggjarnevndini er heimilað landskassans vegna at taka upp innan- ella uttanlandslán uppá 55 mill. kr. sum skilabótatiltak fyri fiskivinnuna.

§ *2.* Lánið verður at nýta til endurfíggjan av veðskuldalánum í skipum, sum vegna ólagaliga fígging uttanlands hava óvanliga tungan rakstur.

§ *3.* Landsstýrið og fíggjarnevndin játta í hvørjum einstøkum føri skilabótalán aftaná tilmæli frá »serlánsnevndini«.
2. stk. Hvørt skilabótalánið sær verður at tryggja við sama veð sum tey avloystu uttanlandslánini høvdu. Tó kann loyvast føroyskum banka ella fíggjanarstovni við innan sama karm, tá slíkir taka lut í endurfíggingini.

§ *4.* Føroya Gjaldstova umsitur skilabótalánini, og kann hon eins lítið og landsstýri ella fíggjarnevnd játta útsetan við rentu- og avdráttargjaldi, tá lánini eru løgd í fasta legu.

§ *5.* Landsstýrið leggur fyri fíggjarnevndina til góðkenningar uppskot uni reglugerð fyri skilabótalán til endurfígging.

lagtingslov om refinancieringslån til fiskerierhvervet.

§ *1.* Landsstyret sammen med finansudvalget bemyndiges til landskassens vegne at optage inden- eller udenlandslån på 55 mill. kr. som refinancieringslån for fiskerierhvervet.

§ *2.* Lånet skal bruges til refinansiering af pantsikrede lån i skibe, som på grund af uhentsigtsmæssig finansiering udenlands har usædvanlig tunge driftsbetingelser.

§ *3.* Landsstyret og finansudvalget bevilger i hvert enkelt tilfælde refinancieringslån efter indstilling fra »serlánsnevndin«.
Stk. 2. Hvert enkelt refinancieringslån skal sikres samme panteret som de udenlandslån havde før de blev afløst. Dog kan tillades færøsk bank eller pengeinstitut pant indenfor samme ramme, når disse tager del i refinancieringen.

§ *4.* Føroya Gjaldstova administrerer refinancieringslånene, og kan denne lige så lidt som landsstyret eller finansudvalget tillade udsættelse med rente- og afdragsbetaling, når lånene er lagt i fast ramme.

§ *5.* Landsstyret forelægger finansudvalget til godkendelse forslag til reglement for refinancieringslån.

§ 6. Henda lóg fær gildi beinanvegin. § 6. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í 60'unum og nakað upp í 70'ini læt landskassin vanliga veðhald fyri 70% av byggikostnaðinum, tá føroysk skip vórðu bygd uttanlands við útlendskari ligging.

Í flestu førum rakk hetta veðhald til samlaða lánið uttanlands.

Tann nógva byggingin fór fram í Noregi, og var lánitíðin har vanliga 7-8 ár mótvegis 10-15 árum í Føroyum og Danmark. Miðskeiðis í 70'unum varð hendan skipan broytt, soleiðis at landskassin við bygging uttanlands veðhelt fyri 14% av samlaða kostnaðinum.

Meðan gongdin her heima og í Danmark í seinastuni hevur verið hon, at lánitíðin fyri nýbyggingar og størri umbyggingar er longd til 10-12-14 og 15 ár, er lánitíðin uttanlands í mongum førum stytt niður í 5-7 ár. Hetta saman við teim broytingum, ið eru hendar síðani oljuprishækkanina í 1978/81, hevur borið við sær, at fleiri skip vegna ringa figging eru um at fara av knóranum og at summi eru farin. Í slíkum føri er vandi fyri, at skipið verður tikið út av landinum.

Kreppulánsskipanin hevur bøtt nakað um her, men hon er so háttað, at hon ofta bert loysir tað útlendska haftið fyri 1 og 2 terminir í senn. Tí metir javnaðarflokkurin, at skulu vit sjálvir hava fulla avgerð um hvørji skip, tað samfelagsbúskaparliga er forsvarligt at veita hjálp, so mugu veðskuldarlánini liggja í Føroyum.

Hetta er galdandi undir verandi umstøðum hesa eina ferð, men kann lættliga broytast aftur. Tí skjýtur flokkurin upp, at hendan loysn er nýtt at ávísari peningaupphædd, meðan veðhaldsheimildir landsstýrisins og figgjarnevndarinnar fyri útlendsk skipalán standa við.

At landskassin verður láuveitari, kann bera tann vanda í sær, at ov nógv kemur at hvíla á honum, og mælir tí flokkurin til, at gjaldsútsetan ikki kann játtast veittum skilabótaláni, men at feløg, sum koma undir hesa skipan verða fyri somu reglum og metingum sum onnur, tá talan verður um almennar veitingar ella stuðul annars.

Á henda hátt er landskassanum tryggjað so væl sum gjørligt, at endurfiggingarlánið verður afturrindað sum ætlað, meðan treytirnar fyri hjálp til einstaka felagið eru tær somu fyri øll. Skip kunnu tá framvegis fara av knóranum, bert er fulla avgerðin hesum viðvíkjandi flutt heim til Føroya.

Í einstøkum føri kann tað vera fyrimunur búskaparliga sæð, at uttanlandsskuld verður burturbeind við at skip verður tikið aftur av útlendingum, men fyri tey skip, sum koma undir skipanina hava vit bert hendan valmøguleika einaferð, tí mælir javnaðarflokkurin til, at serlánsnevndin heldur á við arbeiði sínum, so fortreytirnar fyri hesi meting kunnu vera so góðar sum gjørligt.

At tað umframt tørvi á endurfiggingarláni uttanlands í løtuni er tørvur á nakað størri kreppulánsheimild enn galdandi 5 milj. kr., er helst rætt, og vil javnaðarflokkurin tí taka undir við eini rímiligari hækking av hesi heimild í figgjarárinum, um landsstýrið mælir til slíkar, t.d. 5-6 milj. kr.

Ein minniluti (Adolf V. Hansen) kann taka undir við at heimila landsstýri og fíggjarnevnd at veðhalda fyri skipum og virkjum, og at samlaða upphæddin verður 25 mió. kr., tí er eitt meira relevant tal í dag enn gamla talið 5 mió. kr.

Somuleiðis kann minnilutin taka undir við einum parti av § 2. Tað snýr seg um I og II a) soleiðis sum fíggjarnevndin samdist um at broyta orðaljóðið.

Minnilutin hevur broytingarupskot til II b), og kann ikki taka undir við II c), tí má metast at vera eitt illa umhugsað stykki og í mongum førum ógjøgnumførligt. Kanska við tí úrsliti, at annars solidar fyritøkur fara av knóranum.

Stykkið førir við sær, at allir teir, sum í mong ár hava avskrivað uppá fiskiskip sambært løgtingslóg, og sum hava íhaldsleyst sett sparda skattapeningin í aðra vinnu, onnur skip ella onnur vinnutól, verða strafaðir fyri sín framburðs- ella íløguhuga á tann hátt, at teir kunnu ikki fáa veðhald eftir hesi lóg við tað, at teir ikki kunnu uppfylla treytirnar sambært lógarinnar § 2, II c), uttan so at teir selja tey vinnutól, teir hava gjørt íløgur í við spardum skatti, stavandi frá lógligum avskrivingum.

Bert fá um nakar, nýtir avskrivingarreglurnar til at fáa fatur á peningi til at stuttleika sær við, og í tílíkum føri er einki at heinta kortini.

At viðtaka eina lóg, sum loyvir, fyri ikki at siga áleggur, landsstýri og fíggjarnevnd at straffa okkara bestu og djarvastu »investorum«, kann minnilutin ikki verða við til.

Minnilutin skjýtur tí upp til uppskot landsstýrisins í § 2, II b) soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ 2, II b) verður soljóðandi:

»Har talan er um fiskiskip, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av tí veðhaldsupphædd, ið veitt verður sambært hesi lóg.«

§ 2, II b) formuleres som følger:

»Hvor talen er om fiskeskibe, at egenkapitalen forøges med i det mindste 10% af det garantibeløb, der ydes i henhold til denne lov.«

Harumframt setir sami minniluti fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið setur eina nevnd við einum limi úr hvørjum flokki at kanna hvørjar fyrimunir vinnulívið kundi havt av, at settur varð á stovn ein konvertingar lánigrunnur, hvørs endamál er at geva langfreistað annuitetslán at avloysa tey stuttfreistaðu lánini hjá tí partinum av vinnuni, sum er í tí støðu at hava fyri neyðini at fáa veðhald eftir løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir. Nevndin skal leggja álit fyri tingið á ólavøsku.

2. viðgerð 27. apríl. Málið varð aftur beint í figgjarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

Málið var lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 23. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin legði fram álit í málinum tann 23. apríl 1982, og varð málið eftir 2. viðgerð tann 27. apríl beint aftur í figgjarnevndina.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) ger vart við, at fylgjandi orðing í viðmerkingum landsstýrisins 15. mars 1982: »Fyri umsitingarliga at lætta um viðgerðina av komandi málum av hesum slagi, skal inngjaldið til felagið setast til 40% av gjørdum avskrivingum seinastu 5 árini í aðrari inntøku enn vinningi av skiparakstri«, verður tikin út, og í staðin verður sett: »Inngjaldið til felagið skal svara til sparda skattin«.

Minnilutin (Adolf V. Hansen) setti fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

§ 2, II c verður orðað soleiðis:

»Landsstýrið og figgjarnevndin kunnu sum treyt fyri veðhaldsveiting eftir hesi lóg krevja at spardur skattapeningur tey einastu 3 árini, sum ikki er nýttur til aðrar vinnuligar íløgur, verður inngoldin, og at nýinngoldin verða 10% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum.«

»Landsstyret og finansudvalget kan som betingelse for garantistillelse eftir denne lov kræve at sparet skat for de sidste 3 år, som ikke er anvendt til anden erhvervsmæssig investering, indbetales, og at nyindbetalt bliver 10% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften.«

Framhaldandi 2. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot frá minniluta (Jørgen Thomsen og Ove Mikkelsen) fall við 13-0. Broytingaruppskot frá minniluta (Adolf V. Hansen) fall við 2-0. Landsstýrisins uppskot fall við 16-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1413-5-1.

138. Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om investeringsfonds.

§ 1. Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1. I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonds med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) Í § 4, 1. stk., 2. punktum verður »30%« broytt til »35%.

1) I § 4, stk. 1, 2. punktum ændres »30%« til »35%«.

2) § 6, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Avseting til íløgugrunn kann ikki verða nýtt, fyrr enn 6 mánaðir eru farnir frá tí at hin sambært § 5 skyldugu innseting á konto til íløgugrunn er gjørd«.

2) § 6, stk. 1, affattes således:
»En henlæggelse til investeringsfond kan ikke benyttes, før der er forløbet 6 måneder fra det tidspunkt, hvor den i henhold til reglerne i § 5 pligtige indsættelse på en konto for investeringsfond har fundet sted«.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1983/84.

Viðmerkingar:

Til tess at fremja avsetingar til rakstrargøgn og gera størri avskrivingarmøguleikar av bygningum, skipum, maskinum v.m. verður mælt til at stytta um skyldugu avsetingartíðina og at hækka avsetingarmarkið.

Viðmerkingar til tær einstøku løgargreinirnar:

Til § 4, 1. stk.

Hækkanin av tí prosentupphæddi, ið kann setast í íløgugrunn, er bert galdandi fyri partafeløg.

Til § 6, 1. stk.

Henda regla er galdandi fyri avsetingar hjá bæði persónum og feløgum.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 139: Løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Bæði málini vóru beind í skattanevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 19. mars 1982. Tað varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 139/1981: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Bæði vórðu beind í skattanevndina eftir 1. viðgerð.

Nevndin hevur viðgjørt málini, og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiriluttin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins í hesum máli. Endamálið við uppskotinum er at hækka avsetingarnar hjá partafeløgum í íløgugrunn úr 30% uppi 35%.

Eisini verður mælt til, at tann peningur, sum verður settur í íløgugrunn og eftir galdandi lóg ikki kann verða tikin út og nýttur til íløgur fyrr enn í fyrsta lagi 12 mánaðir eftir, at hann er settur í grunnin, fyri framtíðina kann takast út 6 mánaðir, eftir at hann er skotin inn.

Minnilutin vísir á, at partafeløg í fyrsta lagi kunnu avskriva skip, bygningar og øll onnur rakstrargøgn við upp til 30% av saldovirðinum, at tey í øðrum lagi kunnu seta upp til 30% av tí, sum tá er eftir í íløgugrunn, og at tey í triðja lagi kunnu seta upp til 15% í rakstrargrunn.

Minnilutin heldur, at her eru møguleikarnir so mikið rúmir, at tað als ikki er neyðugt at hækka avsetingarnar í íløgugrunn úr 30% uppi 35%. Í viðmerkingunum til uppskotið, sum bert umfatar 5 reglur, hevur landsstýrið heldur onga grundgeving fyri, hví hesar avsetingar skulu hækkast.

Tá landsstýrið mælir til at stytta skyldugu avsetingartíðina, so dugir minnilutin ikki at finna nakra orsøk til hesa broyting. Tann peningur sum verður settur í íløgugrunn, verður eftir avgerð landsstýrisins lættur út til t.d. menningargrunnin og íðnaðargrunnin.

Tá skylduga avsetingartíðin verður stytt úr 12 niður í 6 mánaðir, verður tað torførari hjá landsstýrinum at gera neyvar metingar um, hvussu mikið teir kunnu lána úr grunninum.

Út frá hesum setir minnilutin eingi uppskot fram, og minnilutin mælir frá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 23. apríl. § 1, pkt. 1 samtykt við 19-0, § 1, pkt. 2 samtykt við 17-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.430-12-19. Lóg nr. 53 frá 6. mai 1982.

---

139. Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 6, 1. stk., 1. punktum verður »12,5%« broytt til »20%«.
2) § 27, 2. stk. verður orðað soleiðis:
Tey í § 14 nr. 5 nevndu felløg v.m. lata skatt til landskassa og kommunu soleiðis:

Er inntøkan minni enn 100.000 kr. verður latið 27%.

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av kr.	og av restini %
100.000	200.000	27.000	100.000	37
200.000	500.000	64.000	200.000	48
yvir	500.000	208.000	500.000	49

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 6, stk. 1, 1. punktum ændres »12,5%« til »20%«.
2) § 27, stk. 2 affattes således:
De i § 14, nr. 5 omhandlede selskaber m.v. svarer skat til landskasse og kommune således:

Er indtægten mindre end 100.000 kr. erlægges 27%.

Er indtægten kr.	men mindre end kr.	erlægges kr.	af kr.	af resten %
100.000	200.000	27.000	100.000	37
200.000	500.000	64.000	200.000	48
over	500.000	208.000	500.000	49

Skatturin verður býttur við 30% sum kommunuskattur og 70% sum landsskattur.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

Skatten fordeles med 30% som kommuneskat og 70% som landsskat.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1983/84.

Viðmerkingar:

Til tess at geva teimum smáu partafeløgunum betri møguleika fyri at menna seg figgjarliga, verður mælt til at lækka skattin fyri partafeløg við skattskyldugari inntøku minni enn 500.000 kr.

Eisini verður mælt til fyri at fremja uppsparing og íløgur í felagið, at hækka avgjaldið av vinningsbýti.

Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar.

Til § 6, 1. stk.

Hækkanin av avgjaldinum av vinningsbýtinum frá føroyskum partafeløgum úr 12,5% til 20% er mett at geva landskassanum eina meirinntøku uppá umleið 600.000 kr.

Til § 27, 2. stk.

Broytingarnar í skattaavtaluni fyri partafeløg eru mettar at føra eina lækking við sær uppá umleið 1,3 mill. kr. í landskassans part.

Partafeløg í skattaárinum *1980/81*

Skattskyldug inntøka	Tal av feløgum	Inntøkur tilsamans	Áliknaður skattur
0 - 500	205	600	396
501 - 5.000	19	56.700	18.798
5.001 - 10.000	21	168.800	55.694
10.001 - 20.000	18	271.100	89.450
20.001 - 30.000	17	420.700	134.561
30.001 - 40.000	21	739.800	245.237
40.001 - 50.000	20	956.100	315.505
50.001 - 60.000	16	876.000	296.667
60.001 - 70.000	14	898.100	319.283
70.001 - 80.000	7	528.500	185.340
80.001 - 90.000	6	515.800	191.790
90.001 - 100.000	5	498.000	189.140

Skattskyldug inntøka	Tal av føløgum	Inntøkur tilsamans	Álíknaður skattur
100.001 - 150.000	15	1.912.400	748.810
150.001 - 200.000	14	2.481.600	1.019.978
200.001 - 250.000	7	1.662.100	716.423
250.001 - 300.000	8	2.267.800	999.218
300.001 - 350.000	2	635.600	283.442
350.001 - 400.000	5	1.937.300	879.273
400.001 - 450.000	2	812.400	370.074
450.001 - 500.000	3	1.421.400	654.483
500.001 og yvir	15	71.480.000	31.270.613
	440	90.540.800	38.984.175

Partafeløg í skattaárinum *1981/82*

Skattskyldug inntøka	Tal av føløgum	Inntøkur tilsamans	Álíknaður skattur
0- .500	294	100	232
501 - 5.000	15	44.800	14.774
5.001 - 10.000	13	106.200	35.249
10.001 - 20.000	25	361.100	119.145
20.001 - 30.000	16	443.100	146.998
30.001 - 40.000	14	502.200	166.781
40.001 - 50.000	19	884.100	291.743
50.001 - 60.000	8	453.400	158.156
60.001 - 70.000	13	839.100	297.906
70.001 - 80.000	6	456.200	166.163
80.001 - 90.000	4	348.400	129.810
90.001 - 100.000	9	857.200	326.631
100.001 - 150.000	13	1.622.100	632.494
150.001 - 200.000	8	1.533.200	639.264
200.001 - 250.000	15	3.384.100	1.448.197
250.001 - 300.000	12	3.357.200	1.477.020
300.001 - 350.000	0	0	0
350.001 - 400.000	3	1.148.600	520.812
400.001 - 450.000	0	0	0
450.001 - 500.000	4	1.889.700	863.407
500.001 og yvir	19	74.668.500	32.574.245
	510	92.899.300	40.009.027

1. viðgerð 23. mars. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 138: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar. Bæði málini vórðu beind í skattanevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 19. mars 1982. Tað varð viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 138/1981: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar. Bæði málini vórðu beind í skattanevndina eftir 1. viðgerð.

Nevndin hevur viðgjørt málini, og hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eli Nolsøe, Jógvan Sundstein og Hilman Kass) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Vilhelm Johannesen og Finnbogi Isaksen) ger hesar viðmerkingar:

Tær broytingar í lógini um skatting av partafeløgum og øðrum vinnufeløgum, sum landsstýrið skjýtur upp, ger skattalógina upp aftur órættvísari enn hon er. Hesi feløg sleppa eftir galdandi lóg lættari í skatti enn einstaklingar, og eftir uppskotinum verða prosentini fyri skattlegging lækkað, samstundis sum gloppið ímillum krónuupphæddirnar, sum prosentini verða roknað av, gerst størri.

Í dag verður skattað eftir hesum reglum:

0 - 50.000 kr.	(33%)	16.500 kr.
50.000-150.000 kr.	(43%)	43.000 kr.
150.000- kr.	(49%)	

Eftir uppskotinum verður skattað eftir hesum stiga:

0 - 100.000 kr.	(27%)	27.000 kr.
100.000 - 200.000 kr.	(37%)	37.000 kr.
200.000 - 500.000 kr.	(48%)	144.000 kr.
500.000 -	(49%)	

Hesar broytingar gera, at partafeløgini sleppa nógv bíligari í skatti enn nú. Niðanfyri eru sett upp nøkur dømi, sum vísa munin millum núverandi og ta ætlaðu skattingina av partafeløgum og einum leysum persóni. Í øllum førunum er roknað við skattskyldugari inntøku, t.v.s. at løntakarafrádrátturin hjá ti leysa persóninum er drigin frá, eins og allar rakstrarútreiðslur og rakstrar- og íløgugrunnar eru drigin frá hjá partafeløgum. Prosenttølini, sum standa í klombrum, vísa marginalskattin. Roknað er við einum kommunuskattaprosenti uppá 18%.

Inntøka	P/f-skattur í dag	Uppskot	Leysir persónar
75.000	27.250 36% (43%)	20.250 27% (27%)	30.200 40% (53%)
100.000	38.000 38% (43%)	27.000 27% (27%)	43,450 43% (53%)
125.000	48.750 39% (43%)	36.250 29% (37%)	56.950 46% (54%)
150.000	59.500 40% (43%)	45.500 30% (37%)	70.450 47% (54%)
200.000	84.000 42% (49%)	64.000 32% (37%)	97.450 49% (54%)
500.000	231.000 46% (49%)	208.000 42% (48%)	250.000 50% (50%)

Sum tað sæst rindar ein leysur persónur munandi meira í skatti eftir galdandi lóg enn eitt partafelag. Munurin verður uppaftur størri, um landsstýrisuppskotið verður samtykt.

Eitt av endamálinum við at broyta skattingina av partafeløgum á sinni var at fáa vinnulívsmenn at stovna feløg heldur enn at reka fyritøkurnar sum einstaklingafyritøkur ella partsreiðarí. tað er tó eftir minnilutans áskoðan ikki neyðugt at lata partafeløgini sleppa so biliga í skatti fyri at fáa menn at stovna slík, tí fyrimunirnir eru so stórir kortini. T.d. hefta partaeigarar í einum partafelag bert fyri tí, sum teir beinleiðis veðhalda fyri, og vandin fyri at koma í figgjarliga trongstøðu er tí minni hjá hesum einstaklingum enn teimum, sum reka vinnufyritøkurnar sum egna ogn. Haraftrat kunnu partafeløg seta pening í rakstrargrunn, sum ikki er loyvt einstaklingum. Partafeløg kunnu seta 30% av í íløgugrunn (eftir uppskotinum verða tað 35%), meðan einstaklingafyritøkur bert kunnu seta 20%.

Verður landsstýrisuppskotið samtykt, verður ein avleiðing, at vit í Føroyum fáa ein hóp av partafeløgum, sum einans hava tað endamál, at eigararnir skulu sleppa billigari í skatti.

Ímóti hesum kann førast fram, at partaeigariu skal gjalda skatt av tí løn, hann tekur úr partafelagnum, men sjálvandi roynir hann at taka sum minst úr.

Minnilutin kann taka undir við, at skatturin av vinningsbýti verður hækkaður úr 12,5% upp í 20%, men metir annars ikki, at hetta hevur so stóran týdning. Tey smáu partafeløgini — og tey eru flest í tali — gjalda ikki vinningsbýti, men løn í staðin.

Minnilutin heldur sum nevnt, at partafeløgini hava so nógvar fyrimunir, at tað er ikki neyðugt at lata tey sleppa so biliga í skatti. Skotið verður tí upp at áseta 50% sum felags skatt fyri øll partafeløg, antin skattskylduga inntøkan er stór ella lítil.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verður

§ *1.* I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med

gjørd henda broyting:

§ 27, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Tey í § 14 nr. 5 nevndu feløg lata 50% av skattainntøkuni í skatti til landskassa og kommunu. Skatturin verður býttur við 40% sum kommunuskattur og 60% sum landsskattur.«

§ 2. Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1983/84.

senere ændringer foretages følgende ændringer:

§ 27, stk. 2 får denne ordlyd:

»De i § 14, nr. 5 omhandlede selskaber m.v. betaler 50% af skatteindtægten i skat til landskasse og kommune. Skatten fordeles med 40% som kommuneskat og 60% som landsskat.«

§ 2. Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1983/84.

2. viðgerð 23. apríl. Minnilutauppskotið til § 1 fall við 16-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins § 1, pkt. 1 samtykt við 31-0, § 1, pkt. 2 samtykt við 17-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-1 atkvøðum.

F.L.j.nr.430-12-36. Lóg nr. 61 frá 6. mai 1982.

---

140. Broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðaravernd.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd verður í § 17 sett sum nýtt stk. 3:

»Landsstýrið kann í kunngerðum eftir stk. 1 áseta, at eftirlitið heilt ella fyri ein part kann fara fram eftir krøvunum í kunngerðum og reglugerðum, ið lýstar eru í Danmark við heimild í donsku arbeiðsumhvørvislógini.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om arbejderbeskyttelse.

§ *1.* I lagtingslov nr. 58 af 24. maj 1974 om arbejderbeskyttelse tilføjes i § 17 som nyt stk. 3:

»Landsstyret kan i bekendtgørelser efter stk. 1 fastsætte, at tilsynet helt eller delvis kan udføres efter kravene i bekendtgørelser og regulativer, der er lyst i Danmark med hjemmel i den danske arbejdsmiljølov.«

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Føroyska arbeiðseftirlitið nýtir í stóran mun tær kunngerðir og reglugerðir, ið lýstar eru at galda í Danmark eftir tí donsku lógini frá 1975 um arbeiðsumhvørvi. Hetta hevur verið neyðugt, tí hvørki Arbeiðseftirlitið ella umsitingin annars hevur arbeiðsorku ella -umstøður til at gera føroyskar kunngerðir á øllum økjum, tí tilfarið er ógvuliga rúgvumikið og verður ofta broytt. Ætlanin er í tílíkum kunngerðum at boða frá, at kunngerðir, ið vist verður til, kunnu fáast frá Arbeiðseftirlitinum. Í fyrstu atløgu verður hugsað um kunngerðir fyri dampketlar, trýstíløt, elevatorar, ymiskar maskinur og listar yvir hygieinisk greiðsluvirðir.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í løganevndina, sum 23. apríl legði fram søljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinum 19. mars 1982 og við 1. viðgerð 23. í s.m. beint í løganevndina.

Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild til í kunngerðum eftir lógini um arbeiðaravernd at vísa til danskar kunngerðir á avvarðandi øki, sum verða at nýta í Føroyum, tá tað verður mett at verða ov nógv arbeiði at útvega føroyskar kunngerðir á øllum økjum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Edmund í Garði og Agnar Nielsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Ein annar minniluti (Guttorm Klein) viðmerkir, at hann 22. í hs. hevur tosað við formannin í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Winther, um hesa lógarbroyting. Hon upplýsir, at hetta evnið hevur verið nógv umrøtt á fundum teirra, tí hendan lógin hevur ikki virkað væl og gleðir seg til at fáa eina lóg, sum kann vera brúkilig.

Hon sigur seg hava skrivað bræv til Føroya Løgting, sum hon meinar varð útbýtt har.

Sami minniluti hevur sama dag tosað við Arbeiðseftirlitið, Eli Davidsen. Hann játtaði somuleiðis, at lógin ikki hevði virkað væl. Grundin til hetta var í fyrsta lagi, at teir í hvørjum føri vóru noyddir at lýsa hesa lóg solciðis, alt eftir tørvi.

Hetta hevir gjørt, at tað mangan hevur verið torført at arbeiða.

Til at bøta um arbeiðaraverndina hevur figgjarnevndin játtað 130.000 kr., normerað til eitt starv aftrat, soleiðis at teir skuldu nú verið munandi betur fyri.

Ætlanin er at senda fólk á skeið fyri at læra seg um arbeiðaravernd.

Ein triði minniluti (Jona Henriksen) kann taka undir við uppskoti landsstýrisins um broytingar í lógini um arbeiðaravernd, men skal samstundis vísa á, at fakfeløgini ferð eftir ferð hava kravt, at arbeiðseftirlitið verður útbygt og fær betri virkismøguleikar, og setir tí hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka til viðgerðar skriv Føroya Arbeiðarafelags um Arbeiðseftirlitið, dagfest 16. mars í ár og sum skjótast at leggja fyri løgtingið broytingar í arbeiðseftirlitinum samsvarandi nevnda skrivi.

Fjórði minniluti (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 24. apríl. Skotið varð upp at beina málið aftur í nevnd. Atkvøðugreiðsla fór fram, um at málið ikki skuldi aftur í nevnd, hetta fall við 15-0. Málið varð sostatt beint aftur í løganevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT
II

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins og áleggur samstundis lóganevndini at arbeiða víðari við viðurskiftunum nevnd í brævi frá Føroya Arbeiðarafelag og øðrum viðurskiftum arbeiðaravernd viðvikjandi.

Sama dag varð framlagt soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Í donsku tekstini í § 1 er orðið »lyst« komið skeivt fyri, rætta orðið er »bekendtgjort«.

Framhaldandi 2. viðgerð 24. apríl. Broytingaruppskot til broyting í donsku orðingini samtykt við 20-0. Landsstýrisins uppskot § 1 samtykt við 31-0 atkvøðum, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Uppsskotið frá nevndini í áliti II samtykt við 31-0 atkvøðum.

3. viðgerð 28. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1305-12-1. Lóg nr. 81 frá 26. mei 1982.

141. Broyting í løgtingslóg um vinningssteðg.

Ár 1982, týsdagin 16. mars legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnusteðg.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1, verða orðini: »hvørki í kr. ella %« broytt til: »í %«.

2) Í § 5 verður »31. mars 1982« broytt til: »31. august 1982«.

§ *2.* Henda lóg fær gildi frá 31. mars 1982.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om avancestop.

§ *1.* I lagtingslov nr. 54 af 14. september 1981 om avancestop foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1, ændres ordene: »hverken absolut eller i %« til: »i %«.

2) I § 5 ændres »31. marts 1982« til: »31. august 1982«.

§ *2.* Denne lov får gyldighed fra 31. marts 1982.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg er galdandi til 31. mars 1982.

Eftir lógini varð settur vinningsteðgur bæði í krónum og prosentum pr. vørueind í mun til tann pr. 7. september 1981 galdandi bruttovinning.

Tað er ikki gjørligt at prógva, hvørja ávirkan lógin hevur havt á prísirnar, men upplýsast kann, at frá 1. oktober 1981 til 1. januar 1982 hækkaði prístalið bert við 1,2 stigum.

Landsstýrið metir, at lógin kann hava sína ávirkan á prislagið og mælir til, at hon verður framlongd til 31. august 1982, tó við teirri broyting, at krónuavmarkingin í vinnninginum verður avtikin.

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum 1. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av landsstýrinm 16. mars 1982 og við 1. viðgerð 23. í s.m. beint í lóganevndina.

Í samband við viðgerðina av málinum hevur tingið fingið soljóðandi skriv frá Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag:

»Undirritaðu feløg vilja við hesum beita á løgtingið um at framleingja løgtingslóg nr. 54/1981 um vinningssteðg óbroytta.

Vit meta, at tað uppskot, sum nú er lagt fyri tingið, als einki virði hevur. Eftir hesum uppskoti kunnu útsølur aftur fáa sama vinning í prosentum, sum tær fingu, áðrenn lógin um vinningssteðg tók við. At seta eitt mark her hevur als ongan týdning, ti vinningurin í prosentum liggur frammanundan rættuliga fastur. Tí kemur tað ikki á nakran hátt at ávirka prísgongdina, um loyvi verður givið til »bert« sama prosentvinning sum frammanundan.

Skal prísgongdin darvast kann tað bert gerast við einum vinningssteðgi í bæði prosentum og serliga í krónum, og vilja vit tí mæla til, at galdandi skipan verður framlongd óbroytt.«

Ein meiriluti í nevndini (Guttorm Klein, Edmund í Garði og Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Ein minniluti (Jona Henriksen og Petur Reinert) kann ikki taka undir við uppskotinum frá landsstýrinum. Minnilutin vísir til støðu javnaðarfloksins í hesum máli í september 1981. Tá setti flokkurin fram uppskot til løgtingslóg um prís- og vinningssteðg. Hetta uppskot vann ikki frama á tingi.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið í løgtingsmáli nr. 141/1981 sigur landsstýrið m.a.: »Tað er ikki gjørligt at prógva, hvørja ávirkan lógin hevur havt á prísirnar, men upplýsast kann, at frá 1. oktober 1981 til 1. januar 1982 hækkaði prístalið bert við 1,2 stigum.«

Minnilutin vísir á, at síðani løgtingsmál nr. 141 varð framlagt, er prístalið pr. 1. apríl 1982 kunngjørt, og hækkar prístalið nú við 2,6 stigum. Hetta bendir á, at lógin ikki hevur virkað eftir ætlan, og hetta prógvar til fulnar, at uppskot javnaðarfloksins um prís- og vinningssteðg hevði virkað munandi betur enn galdandi lóg, sum bert umfatar vinningssteðg.

Tá minnilutin metir, at ein lóg um prís- og vinningssteðg gongur víðari og í størri mun hevði virkað eftir ætlan, vil minnilutin í fyrstu syftu seta fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um prís- og vinningssteðg.	*lagtingslov om pris- og avancestop.*
§ *1.* Ásettur verður prís- og vinningssteðgur fyri allar vørur og tænastur í tíðarskeiðinum frá 1. apríl 1982 til 31. august 1982.	§ *1.* Der fastsættes pris- og avancestop for alle varer og tjenester i tidsrummet 1. april 1982 til 31. august 1982.
§ *2.* Í hesum tíðarskeið kunnu prishækkanir ikki fara fram við undantak	§ *2.* I dette tidsrum kan prisforhøjelser ikke finde sted med undtagelse af for-

av hækkingum í gjøldum til almennar stovnar, sum verða loyvdar av Føroya landsstýri og løgtingsins figgjarnevnd.

§ 3. Tó kann prisráð Føroya eftir umsókn geva loyvi til prishækkingar, tá fullgott prógv er fyri at so má vera.

§ 4. Í reglugerð, sum skal góðkennast av figgjarnevnd Føroya Løgtings, ásetir Føroya landsstýri nærri reglur fyri, hvussu hendan lóg verður at umsita.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1982.

højelser af afgifter til offentlige institutioner, der tillades af Færøernes landsstyre og lagtingets finansudvalg.

§ 3. Prisrådet kan dog efter ansøgning give tilladelse til prisforhøjelser, når der foreligger tilstrækkeligt bevis for at dette er nødvendigt.

§ 4. I regulativ, der skal godkendes af lagtingets finansudvalg, fastsætter landsstyret nærmere bestemmelser om, hvorledes denne lov skal administreres.

§ 5. Denne lov træder i kraft 1. april 1982.

Í aðru syftu kann minnilutin taka undir við, at løgtingslóg nr. 54 frá 14. september 1981 um vinningssteðg verður framlongd óbroytt, soleiðis at lógin fær gildið til 31. august 1982.

Tá landsstýrið nú mælir til, at lógin verður framlongd við tí broyting, at orðingin »hvørki í kr. ella í %« verður broytt til »í %«, so metir minnilutin, at hetta verður eitt afturstig.

Annars vísir minnilutin á, at tað er heyðugt, at priseftirlitið verður effektiviserað, og her vísir minnilutin til støðu javnaðarfloksins í málinum til figgjarløgtingslógina 1982/83.

2. viðgerð 19. apríl. Uppskot landsstýrisins § 1 og § 2 samtykt við 17-0. Uppskot frá minniluta í løganevndini, § 1, fall við 14-0.

3. viðgerð 22. apríl. Uppskotið samtykt við 17-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1115-24. Lóg nr. 51 frá 6. mai 1982.

142. Løgtingsins umboðsmaður.

Ár 1982, týsdagin 16. mars legði Jógvan Sundstein, løgtingsformaður vegna Karin Kjølbro og seg sjálvan fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at sett verður 5-manna nevnd til at gera lógaruppskot um eina skipan við einum Løgtingsins umboðsmanni til at hava innlit við teirri fyrisiting, sum er undirgivin føroyska heimastýrinum og føroysku kommununum.

Nevndin skal vera liðug við arbeiði sítt í seinasta lagi 31. januar 1983, og skal nevndarálitið tá við lógaruppskoti leggjast aftur fyri tingið.

Viðmerkingar:

Uppskot um Løgtingsins umboðsmann hevur áður verið lagt fyri tingið, sí tingmál nr. 17/1978 og nr. 74/1979. Vist verður til hesi mál, men kortini skulu nakrar av viðmerkingunum endurtakast her.

Almenna fyrisitingin arbeiðir vegna Løgtingið og kommunurnar. Henda fyrisiting hevur ávirkan á viðurskiftini hjá hvørjum einstøkum borgara, og hevur tað tí stóran týdning, at hon virkar sum hon skal bæði viðvikjandi rættleikanum av avgreiðslunum, hvussu hon fer fram í atburði mótvegis borgarunum, og at avgreiðslur verða framdar uttan óneyðugan seðg.

Í Danmark hava teir ein Folketingets Ombudsmand, og hevur hesin samtiert danska lóg eisini innlit við statsins fyrisiting í Føroyum, men ikki viðvikjandi fyrisitingini hjá heimastýrinum og kommununum.

Sum ein trygd hjá tí einstaka borgaranum og hjá Løgtinginum og bygda(r) og býráðum fyri, at fyrisitingin virkar, sum hon skal, halda vit tað vera rætt, at ein slíkur umboðsmaður verður settur. Samstundis er hann ein trygd hjá fyrisitinginj sjálvari móti óneyðugum mistonksemi.

Bæði tingið, bygda(r)- og býráð og tann einstaki borgarin skal kunna heita á umboðsmannin um kannan av ávísum málsviðgerðum, eins og umboðsmaðurin sjálvur skal kunna gera tað av sínum eintingum.

Nevndin eigur at hava fríar hendur at kanna, hvussu hini Norðanlondini hava skipað síni viðurskifti á hesum øki, eins og hon kann meta um, um onnur øki enn sjálv fyrisitingin skal umfatast av umboðsmannastovninum.

Eisini eigur nevndin at meta um kostnaðin av eini umboðsmannaskipan.

Av tí, at umboðsmaðurin skal umboða Løgtingið og kanna fyrisitingina, herundir

eisini embætisførsluna hjá landsstýrismonnunum, er rættast, at tað er tingið einsamalt, sum velur nevndina til at fyrireika málið, og tað kemur beinleiðis aftur til tingið frá nevndini.

1. viðgerð 24. mars. Málið varð beint í lóganevndina, sum legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt 16. mars 1982 av Karini Kjølbro og Jógvani Sundstein og við 1. viðgerð 24. í s.m. beint í lóganevndina.

Eftir uppskotinum verður mælt til at seta eina 5-mannanevnd at gera uppskot til eina løgtingslóg um ein løgtingsins umboðsmann.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein meirihluti (Guttorm Klein, Edmund í Garði, Petur Reinert og Jóannes Dalsgaard) í nevndini undir við uppskotin um frá Karini Kjølbro og Jógvani Sundstein.

Minnilutin (Agnar Nielsen) setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 23. apríl. Uppskotið varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

24. apríl valdi løgtingið hesar limir í nevndina:

Demmus Hentze, Trygve Samuelsen, Kári Petersen, Halgir Winther Poulsen, Karin Kjølbro.

---

143. Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna.

Ár 1982, týsdagin 16. mars legði Olaf Olsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

I UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3, 1. punktum verður orðað soleiðis:
»Minstaløunin er pr. 1. apríl 1982 kr. 8.500,00 um mánaðin, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg.«

2. § 4, 2. punktum verður orðað soleiðis:
»Minstiforvinningurin er pr. 1. apríl 1982 310 kr. til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin.«

3. Í § 5, 1. stk. a verður skoytt uppi:
»Hesin stuðul fellur burtur, tá verandi túrur er lokin«.

4. Í § 6, 1. stk. a verður skoytt uppi:
»Hesin stuðul fellur burtur, tá verandi túrur er lokin.«

5. Í § 6, 1. stk. d verður »10 oyru/kg« broytt til »8 oyru/kg.«

6. Í § 6, 1. stk. e verður »43 oyru/kg« broytt til »36 oyru/kg«.

7. Í § 6, 1. stk. f verður »23 oyru/kg« broytt til »19 oyru/kg«.

8. Í § 6, 1. stk. g verður »43 oyru/kg« broytt til »36 oyru/kg«.

9. § 6, 1. stk. h verður orðað soleiðis:
»Deksfiskifør undir 110 BRT í linu snøris- ella snelluveiðu 19 oyru/kg.«

§ *2.* Henda lóg fær gildi 1. apríl 1982.

§ *1.* I lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:

1. § 3, 1. punktum formuleres således:
»Mindstelønnen er pr. den 1. april 1982 kr. 8.500,00 pr. måned, hver fisketur beregnet for sig.«

2. § 4, 2. punktum formuleres således:
»Mindsteindtægten er pr. 1. april 1982 310 kr. til hver af mandskabet for hver fiskedag«.

3. I § 5, 1. stk. a tilføjes:
»Dette tilskud bortfalder efter nuværende fangstturs afslutning.«

4. I § 6, 1. stk. a tilføjes:
»Dette tilskud bortfalder efter nuværende fangstturs afslutning.«

5. I § 6, 1. stk. d ændres »10 øre/kg« til» 8 øre/kg.«

6. I § 6, 1. stk. e ændres »43 øre/kg« til »36 øre/kg.«

7. I § 6, 1. stk. f ændres »23 øre/kg« til »19 øre/kg«

8. I § 6, 1. stk. g ændres »43 øre/kg« til »36 øre/kg.«

9. § 6, 1. stk. h formuleres således:
»Dæksfiskefartøj under 110 BRT i line-, snøre- eller snellefiskeri 19 øre/kg.«

§ *2.* Denne lov træder i kraft 1. april 1982.

II

UPPSKOT
til
løgtingslóg um broyting í oljustudninginum.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 1980 um brennioljustudning verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum nýggj § 2 verður sett:

»Í cykastudningi fyri rundan fisk og svartkalva, kruvdur, kongafiskur undantikin, við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum, verður fyri at lækka um útreiðslurnar til brenniolju, latið í studningi 5 oyru/kg fyri allan linu-, snellu- og garnaveiddan fisk, tó 10 oyru/kg fyri trolveiddan. Studningurin verður roknaður av uppvigaðu vektini.«

2. § 2 og § 3 verða ávikavist § 3 og § 4.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1982.

lagtingslov om ændring i olietilskudet.

§ *1.* I lagtingslov nr. 25 af 18. marts 1980 om brændselsolietilskud foretages følgende ændringer:

1. Som ny § 2 indsættes:

»I ekstratilskud for rund fisk og hellefisk, renset, rødfisk undtaget, med hoved, der er strubeskåret og godt renset og indhandlet på Færøerne, ydes med det formål at nedbringe udgifterne til brændselsolie i tilskud 5 øre/kg for al line-, snelle- og garnfanget fisk, dog 10 øre/kg for trawlfanget. Tilskudet beregnes af den opvejede vægt.«

2. § 2 og § 3 bliver henholdsvis § 3 og § 4.

§ *2.* Denne lov træder i kraft fra 1. april 1982.

III

UPPSKOT
til
løgtingslóg um studning til veiðu av svartkjafti.

§ *1.* Til landingar av svartkjafti frá føroyskum fiskifari í Føroyum verður latið í studningi 20 oyru/kg av teimum fyrstu 10.000 tonsunum, ið landað eru, eftir at henda lóg er komin í gildi. Studningurin verður at býta millum manning og fiskifar, sum søla av veiðu verður býtt.

lagtingslov om tilskud til fangst af blåhvilling.

§ *1.* Til landing af blåhvilling fra færøske fiskerfartøjer på Færøerne ydes i tilskud 20 øre/kg af de første 10.000 tons, der er landet, efter at denne lov er sat i kraft. Tilskudet fordeles mellem mandskab og fiskerfartøj på samme måde, som salg af fangst fordeles.

§ 2. Henda lóg fær gildi 1. juni 1982 og fer úr gildi 28. februar 1983.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 1. juni 1982 og træder ud af kraft den 28. februar 1983.

Viðmerkingar:

Stuðul til fiskivinnuna (í 1000 kr.)

	1981/82	*1982/83*
1. Minstalønin (hækkast við 400-500 kr. til 8.500 kr.)	6.000	6.000
2. Minstiforvinningur (hækkast við 30 kr. til 130 kr.)	1.200	1.200
3. Prísískoyti til saltfisk (bert fyri inniverandi túr hjá trolarunum, óbroytt fyri linuskipini)	4.000	2.500
4. Útróðrarstudningur	6.800	6.500
5. Landingarstudningur	7.200	7.000
6. Flakastudningur (telur við fyri flakaframleiðslu hjá svartkjaftaskipum)	300	700
7. Hemara- og svartkalvastudningur	200	200
8. Ídnaðarstudningur (tað kann vera rætt at geva 20 oyru eyka studning til svartkjaft til ídnað frá 1. juni 1982 til 28. februar 1983)	4.250	5.000
9. Brennioljustudningur (uppskot um at lækka eykaoljustudningin frá ávikavist 7 og 14 oyru til 5 og 10 oyru/kg av fiski)	40.700	38.500
10. Agnstudningur (lítið meir enn helmingurin nýttur enn, skipanin má endurskoðast)	9.000	9.000
11. Rakstrarstudningur (uppskot um at lækka hann við einum 18% frá ávikavist 10, 23 og 43 til 8, 19 og 36 oyru/kg)	45.800	38.000
12. Frítíðarløn	1.400	1.400
13. Fyrisæti	1.500	1.500
14. Rentuútreiðslur	500	500
15. Ráfiskagrunnurin (uppskot um at lækka við 10 mió. kr., men rætt at seta tær 10 serliga til svartkjaft)	67.000	67.000
16. Tiltaksgrunnur Ráfiskagrunsins	5.000	5.000
17. Grunnur til figging av fiskiskapsroyndum á frentmandum høvum	5.000	3.000
18. Serligur grunnur til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað	00	10.000
	205.850	203.000

Viðmerkingar til tær ymsu broytingarnar í uppskotinum:

1. Minstuløthings verður skotið upp at hækka við millum 400 og 500 kr. til 8.500 kr. um mánaðin, fyri at hon kann verða ájavnt við eina arbeiðsmannaløn á landi. Eftir meting Lønjavningargrunsins er nóg mikið at avseta somu upphædd.
2. Sama er við minstaforvinninginum, sum skotið verður upp at hækka til 310 kr. um dagin.
3. Av tí at rakstur og hýra hjá saltfiskatrolarunum vóru stak góð í fjør, og útlitið fyri í ár eisini er gott, verður skotið upp ikki at lata rakstrarstudning og prísfskoyti fyri teir túrar, sum ikki eru byrjaðir, men bert fyri hesar.
4. og 5. Her verður rátt til at hava somu skipan, men hesar játtanir halda væl, tí skuldu ávikavist 6,5 og 7 mió. kr. verið nóg mikið her.
6. Flakastudningurin verður hækkaður við 400.000 kr. til 700.000 kr. Hetta kemst av, at studningur verður latin til svartkjaftaflak, og henda nøgdin kann roknast við at økjast.
7. Avsett verður tað sama.
8. Her kann vera, at tann vanliga idnaðarveiðan minkar, men tað kann verða rætt at geva 20 oyru eyka í prísstudningi til veiðu eftir svartkjafti til idnað frá 1. juni 1982 til 28. februar 1983. Tí er upphæddin hækkað við 750.000 kr. til 5 mió. kr.
9. Skotið verður upp at lækka eykaoljustudningin við ávikavist 2 og 4 oyrum til 5 og 10 oyru fyri hvørt kg av veiddum fiski. Upphæddin verður metti at lækka við 2,2 mió. kr. til 38,5 mió. kr.
10. Til agnstudning verður sett tað sama. Her er langt frá allur studningur nýttur. Skipanin má endurskoðast gjølliga.
11. Av tí at raksturin hjá skipunum vísir eitt munandi betri úrslit fyri 1981 enn fyri 1980 verður skotið upp at lækka rakstrarstudningin frá 10, 23 og 43 oyru til ávikavist 8, 19 og 36 oyru fyri kg. Hetta skuldi lækka upphæddina við um 7,8 mió. kr. til 38 mió. kr.
12, 13 og 14. Fritíðarløn, fyrisæti og rentuútreiðslur verða metti at kosta tað sama sum síðsta figgjarár.
15. Fiskivinnuráðið skjýtur upp at lækka játtanina til rakstrargrunn Ráfiskagrunsins við 10 mió. kr., treytað av at prísurin ikki lækkar. Hetta kann verða torført at uppfylla samstundis og við tí í huga, at tað kann vera neyðugt at stuðla svartkjaftaprísin serliga eina tíð, verður skotið upp at játta somu upphædd sum fyri 1981/82.
16. Somu upphædd sum seinast.
17. Tað verða kanska ikki líka nógvar royndir av hesum slag næsta ár. Um tær verða, vil verða rætt at nýta peningin øðrvísi, soleiðis at royndirnar verða gjørdar á breiðari grundarlagi, so játtanin kann røkka longri. Tí verður skotið upp at lækka játtanina við 2 mió. kr. til 3 mió. kr.
18. Serligur grunnur til fiskivinnuna, mest til at stuðla veiðu o.l. sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men kann gerast til tað.

SÍ SKJØLINI 17 A-G

1. viðgerð 23. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 27. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. mars 1982 og undir 1. viðgerð 23. s.m. beint í figgjarnevndina.

Talan er um trý uppskot:

I Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna,

II Uppskot til løgtingslóg um broyting í oljustudninginum og

III Uppskot til løgtingslóg um studning til veiðu av svartkjafti.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Guttorm Klein) førir fram:

Viðvíkjandi I er meirilutin samdur um, at pr. 1. apríl 1982 er minstaløunin kr. 8.600,00, og somuleiðis minstiforvinningurin verður settur til kr. 314,00 um dagin frá 1. apríl 1982.

Viðvíkjandi § 5, 1. stk. a, og § 6, 1. stk. a er meirilutin av teirri áskoðan, at henda regla eigur at verða broytt solciðis, at hon bert verður galdandi fyri 1. landing í 1982 og skal síðani fella burtur.

Ávísar broytingar í oyraupphæddunum eru gjørdar, soleiðis at samsvar er millum tølini eftir ti grundarlag, ið liggur í stuðulslógini.

Viðvíkjandi § 6, h mælir meirilutin til, at løgtingið samtykkir, at ein broyting verður gjørd, soleiðis at reglan umfatar øll garnaskip og fiskifør undir 110 brt. í línu-, snøris- ella snelluveiðu. Her er neyðugt, at geva hesari reglu afturvirkandi kraft frá 1. apríl 1981, tá tað ikki var ætlanin, at ávís garnaskip skuldu latast úti í hesi skipan.

Viðvíkjandi § 5, 1. stk. d og § 6, 1. stk. c verður mælt til, at veittur verður ein studningur uppá 30 oyru/kg til fars, og at hesin studningur í fyrsta umfari verður avmarkaður til at vera galdandi fyri 1 ár.

Viðvíkjandi § 6, 1. stk. e er tað uppskot frá meirilutanum, at trolari við upp til 1400 hk høvuðsmaskinu, sum ikki kemur undir fyrisetningarnar í pkt. d í feskfiskaveiðu á føroysku landleiðini uttanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum, og trolari á iðnaðarveiðu við feskfiskaveiðu sum hjáveiðu, av hesi veiðu skulu fáa 36 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 73 oyru/kg, um hesi fiskasløg verða veidd á føroysku landleiðini. Fyri trolarar við høvuðsmaskinu 1400 hk ella yvir verður studningurin ávikavist 43 oyru/kg og 80 oyru/kg.

Undir II Uppskot til løgtingslóg um broyting í oljustudninginum er ein feilur gjørdur í 1981, soleiðis at høvuðsreglan í § 1 í løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 1980 fór úr gildi

orsakað av skeivari avgreiðslu og er tí neyðugt at seta § 1, ið ljóðar: »At lækka um prísin á brenniolju til deksfiskifør á fiskiveiðu verða úr landskassanum latin 44 oyru/liturin í studningi« í gildi aftur og at lata hesa reglu fáa afturvirkandi kraft frá 1. apríl 1981.

Til III Uppskot til løgtingslóg um studning til veiðu av svartkjafti hevur meirilutin onga viðmerking og mælir sostatt til at samtykkja uppskot landsstýrisins við omanfyri tilskilaðu broytingum.

Viðvíkjandi pkt. 18 (síða 7) í viðmerkingunum til uppskot landsstýrisins, har avsettar verða 10. mió. kr. til fiskivinnuna mest til at stuðla veiðu, sum ikki hevur verið munandi táttur í samfelagnum higartil, men sum kann gerast tíl tað, eru tað landsstýrið og fíggjarnevndin saman, ið taka avgerð um, hvussu hesin peningur verður nýttur.

Meirilutin setir ti fram soljóðandi

I Broytingaruppskot
til
til

uppskot landsstýrisins:

1) Í § 3, 1. punktum verður í staðin fyri »kr. 8.500,00« sett: »kr. 8.600,00«.
2) Í § 4, 2. punktum verður í staðin fyri »310 kr.« sett: »314 kr.«.
3) Í § 5, 1. stk. a verður í staðin fyri uppskot landsstýrisins sett:
   »Er bert galdandi fyri fyrstu landing 1982. Fellur síðani burtur.«
4) § 5, 1. stk. d verður orðað soleiðis:
   »Trolari á flaka- og/ella farsveiðu 30 oyru/kg av flaki og farsi, uppvigað vekt.«
5) § 5, 1. stk. e verður »1. apríl 1981« broytt til: »1. apríl 1982«.
6) Í § 6, 1. stk. a verður í staðin fyri uppskot landsstýrisins sett:
   »Er bert galdandi fyri fyrstu landing 1982. Fellur síðani burtur.«
7) Í § 6, 1. stk. c verður orðað soleiðis:
   »Trolara á flaka- ella farsveiðu 30 oyru/kg av flaki og farsi uppvigað vekt.«

1) I § 3, 1. punktum indsættes i stedet for »kr. 8.500,00«: »kr. 8.600,00«.
2) I § 4, 2. punktum indsættes i stedet for »310 kr.«: »314 kr.«.
3) I § 5, stk. 1, a indsættes i stedet for landsstyrets forslag:
   »Er kun gældende for første landing 1982. Falder siden væk.«
4) § 5, stk. 1, d får følgende ordlyd:
   »Trawler i filet- og/eller farsfiskeri 30 øre/kg af filet og fars, opvejet vægt.«
5) § 5, stk. 1 e ændres »1. april 1981« til: »1. april 1982«.
6) I § 6, stk. 1 a indsættes i stedet for landsstyrets forslag:
   »Er kun gældende for første landing i 1982. Falder siden væk.«
7) I § 6, stk. c får følgende ordlyd:
   »Trawler i filet- eller farsfiskeri 30 øre/kg af filet og fars opvejet vægt.«

8) Í § 6, sum nýtt 1. stk. e verður sett:
»Trolari við upp til 1400 hk høvuðsmaskinu, sum ikki kemur undir fyrisetningarnar í punkt d, í feskfiskaveiðu á føroysku landleiðini uttanfyri 12 fjórðingar úr grunnlinjunum, og trolarar á iðnaðarveiðu við feskfiski sum hjáveiðu, av hesi veiðu 36 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 73 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini. Fyri trolarar við høvuðsmaskinu uppá 1400 hk ella yvir, verður studningurin ávikavist 43 oyru/kg og 80 oyru /kg.«

9. Í § 6, 1. stk. f verður »60 oyru« broytt til »56 oyru«.
10. Í § 6, 1. stk. g verður »80 oyru« broytt til »73 oyru«.
11. Í § 6, 1. stk. h verður orðingin »Øll garnaskip, og fiskifør undir 110 brt. í línu-, snøris- ella snelluveiðu 19 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 56 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini.«

12. § 5, 3. stk. fellur burtur.
13. § 6, 3. stk. fellur burtur.
14. § 5, stk. 1 d er bert galdandi frá 1. apríl 1982 til 31. mars 1983.

15. § 6, 1. stk. e er bert galdandi frá 1. apríl 1982 til 31. mars 1983.

16. § 6, 1. stk. h hevur fyri garnaskip gildi frá 1. apríl 1981.

8) § 6, som nyt stk. 1, e formuleres således:
»Trawler med op til 1400 hk hovedmaskineri, som ikke kan henføres under foresætningerne i punkt d på ferskfiskefangst på det færøske fiskeriterritorium uden for 12 sømil fra grundlinierne, og trawlere på industrifiskefangst med fersk fisk som bifangst 36 øre /kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 73 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på færøsk fisketerritorium. For trawlere med hovedmaskineri på 1400 hk eller derover bliver tilskudet henholdsvis 43 øre/kg og 80 øre/kg.«

9. I § 6, stk. 1 f ændres »60 øre« til »56 øre«.
10. I § 6, stk. 1 g ændres »80 øre« til »73 øre«.
11. I § 6, stk. 1 h bliver formuleringen »Alle garnfiskefartøjer og fiskefartøjer under 110 brt på line-, snøre- eller snellefiskeri 19 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 56 øre/kg, såfremt disse fiskesorter er fisket på færøsk fisketerritorium.«

12. § 5, stk. 3 bortfalder.
13. § 6, stk. 3 bortfalder.
14. § 5, stk. 1 d er kun gældende for perioden 1. april 1982 til 31. marts 1983.

15. § 6, stk. 1 e er kun gældende for perioden 1. april 1982 til 31. marts 1983.

16. § 6, stk. 1 h er for garnfiskefartøjer gældende fra 1. april 1981.

II

UPPSKOT

til

broyting í løgtingslóg um broyting í oljustudninginum.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 25 frá 18. mars 1980 um brennioljustudning til skip verður gjørd henda broyting:

§ 1 verður soljóðandi:

»At lækka um prisin á brenniolju til føroysk deksfiskifør á fiskiveiðu verða úr landskassanum latin 44 oyru/litur í studningi. Henda regla fær gildi frá 1. apríl 1981.«

ændring i lagtingslov om ændring i brændselstilskuder.

§ *1.* I lagtingslov nr. 25 af 18. marts 1980 om brændselstilskud til skibe, foretages følgende ændring:

§ 1 formuleres således:

»Til nedbringelse af prisen af brændselsolie til færøske fiskiskibe i fiskeri ydes af landskassen 44 øre/liter i tilskud. Denne bestemmelse får gyldighed fra 1. april 1981.«

Minnilutin (Jørgen Thomsen) ásannar tann veruleika, at tað altsamt verður neyðugt við royndarfiskiskapi á óroyndum fiskileiðum og eftir óroyndum fiskasløgum, og at hesin fiskiskapur sum oftast gevur lítla inntøku til manningarnar. Eitt dømi um hetta er svartkjaftatrolarin »Giljanes«. Minnilutin tekur undir við ynsl i Føroya Fiskimannafelags um eina serliga ískoytisminstuløn, tá talan er um royndarfiskiskap. Minnilutin mælir til, at landsstýrið og løgtingsins fiskivinnunevnd fáa heimild til at veita eina ískoytisminstuløn uppá 25% av galdandi minstuløn, tá talan er um slíkar fiskiroyndir.

Minnilutin heldur tað vera órimiligt, at menn, ið hava útróður við opnum bátum sum vinnu, ikki skulu hava somu sømdir sum teir, ið reka somu vinnu við deksførum. Vert er at hava í huga, at á nøkrum plássum letur tað seg ikki gera at reka heimaútróður við deksfiskiførum. Minnilutin mælir til, at manningarnar á opnum bátum koma undir reglurnar um minstaforvinning, treytað av, at avvarðandi útróðrarfelag ella avvarðandi kommuna kunnu vátta, at hesir menn hava útróður við opnum bátum sum vinnu.

Í uppskotinum frá landsstýrinum verður mælt til, at manningarstudningurin á trolarum á saltfiskaveiðu, sum nú er 50 oyru/kg, verður avtikin alt í einum. Sum grundgeving fyri hesi broyting vísir landsstýrið á, at manningarnar á trolarunum hava fingið sera væl burtur úr hetta seinasta árið. Hóast trolaramanningarnar hava fingið væl burtur úr, er minnilutin ikki samdur í, at allur studningurin verður tikin frá teimum longu nú. Mælt verður til, at studningurin fyribils verður settur niður í helvt.

Úrslitini hjá línubátunum við New Foundland í ár eru eitt talandi dømi um, hvussu skjótt fiskiskapur kann broytast. Seinastu árini hevur fiskiskapurin hjá hesum bátum verið framúr góður, men í ár er vend komin í, soleiðis at bátarnir eftir

trimum mánaðum ikki havu fingið meira enn umleið 100 tons í part. Minnilutin mælir til, at manningarstudningurin hjá hesum verður hækkaður úr 50 upp í 70 oyru fyri kg.

Svartkjaftaveiða við farsframleiðslu fyri eyga er so at siga einasti táttur í okkara fiskivinnu, sum ongan studning fær yvirhøvur, og tá hugsað verður um, at her er talan um eina nýggja veiðu og um eina nýggja framleiðslu, metir minnilutin, at tað er skeivt, at fars úr svartkjafti ongan studning fær. Mælt verður til, at manningarnar í hesi vinnu fáa ein studning uppá 48 oyru/kg ella tað sama sum fyri flak, og at hesin studningur verður latin uttan mun til, um veiðan verður landað í Føroyum ella í útlondum.

Minnilutin metir, at manningarnar á deksførum á feskfiskaveiðu við líru og snellu eru tann parturin av fiskimonnum, ið fáa minst burturúr. Vísast kann til skriv frá Føroya Fiskimannafelag dagfest 19. mars í ár, har m.a. verður sagt: »Fiskimenn við ísfiskalínuskipum hava í fleiri ár verið tann bólkur av fiskimonnum, sum hevur havt eina av teimum vánaligastu inntøkunum í flotanum.«

Manningarstudningurin til hesar varð í 1980 settur til 32 oyru/kg. Við tað at studningurin lækkar, tá prísurin fer upp, er hesin munandi lægri nú. Minnilutin mælir til at seta manningarstudningin til deksfør á feskfiskaveiðu við líru og snellu til 50 oyru/kg.

Skoytast kann uppí, at fyri at bøta um viðurskiftini hjá líru- og snelluskipunum, kundi verið vert at umhugsa at broyta býtið millum húk og trol av íslandskvotuni, soleiðis at líru- og snelluskip fingu í minsta lagi 3/4 av hesi kvotu. Vert er at hava í huga, at í húkaveiðiførum fáa hundraðtals fiskimenn úrtøku sína, meðan manningartalið á trolarum, ið veiða við Ísland neyvan røkkur teimum 100.

Vísandi til framanfyri standandi setir minnilutin fram hesi

Broytingaruppskot

1) Í § 3 verður sett sum nýtt 2. stk.:

»Landsstýrinum verður heimilað saman við løgtingsins fiskivinnunevnd at veita eitt ískoyti uppá 25% av galdandi minstuløn, tá talan er um royndarfiskiskap á óroyndum fiskileiðum og/ella eftir óroyndum fiskasløgum.«

2) 2. stk. verður 3. stk.

3) Í § 4 verður sum nýtt 2. stk. sett:

»Minstiforvinningur er eisini galdandi fyri manningar á opnum bát-

1) I § 3 indsættes som nyt stk. 2:

»Landsstyret får hjemmel til sammen med lagtingets fiskeriudvalg at yde et tilskud på 25% af den gældende mindsteløn, når der er talen om forsøgsfiskeri på uudforskede fiskeriområder og/eller efter fiskesorter, der ikke er forsøgt fanget før.«

2) Stk. 2 bliver stk. 3.

3) I § 4 indsættes som nyt stk. 2:

»Mindsteindtægten er også gældende for besætninger på åbne både

um, ið hava útróður sum vinnu. Treytin er, at avvarðandi útróðrarfelag váttar hetta. Har einki útróðrarfelag er, verður nevnda váttan givin av kommunuui.«

4) 2. stk. verður 3. stk.
5) Í § 5, 1. stk. a verður »50 oyru« broytt til »25 oyru«.
6) Í § 5, 1. stk. b verður »50 oyru« broytt til «70 oyru«.
7) § 5, 1. stk. d verður orðað soleiðis:

»Á trolara á flakaveiðu 58 oyru/kg av kílaskornum flaki uttan skræðu uppvigað vekt. Annars 48 oyru/kg. Fyri fars úr svartkjafti 48 oyru/kg, og verður hesin studningur undantikin reglunum í somu §, 3. stk.«

8) Í § 5, 1. stk. e verður »32 oyru« broytt til »50 oyru« og »1. februar 1980« broytt til »1. apríl 1982«.
9) § 5, 1. stk. f verður orðað soleiðis:

»Á trolara á feskfiskaveiðu 5 oyru/kg. Á deksfiskifari við gørnum 20 oyru/kg.«

som har hjemmefiskeri som erhverv. Betingelsen er, at vedkommende hjemmefiskeriforening bekræfter dette. Hvor der ikke findes nogen hjemmefiskeriforening, ydes nævnte bekræftelse af kommunen.

4) Stk. 2 bliver stk. 3.
5) I § 5, stk. 1 a ændres »50 øre« til »25 øre«.
6) I § 5, stk. 1 b ændres »50 øre« til »70 øre«.
7) § 5, stk. 1 d formuleres som følger:

»På trawler i filétfiskeri 58 øre/kg af kileskåret filét uden skind, opvejet vægt. Ellers 48 øre/kg. For fars af blåhvilling 48 øre/kg, og undtages dette tilskud for reglerne i samme §'s stk. 3.«

8) I § 5, stk. 1 e ændres »32 øre« til »50 øre« og »1. februar 1980« ændres til »1. april 1982«.
9) § 5, stk. 1 f formuleres som følger:

»På trawler på ferskfiskfiskeri 5 øre/kg. På dæksfiskerskib med garn 20 øre/kg.«

Ein minniluti (Adolf V. Hansen og Ove Mikkelsen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins við fylgjandi grundgevingum:

Árini 1979 til 1981 vóru samanumtikið rak ár fyri fiskivinnuna á sjónum, hvat eisini serláns- og kreppulánstørvurin bera boð og prógv um.

Minnilutin metir, at vinnan enn hevur nógva leysaskuld og annað ógoldið at dragast við, bæði innan sjálva vinnuna og innan økonomiin hjá ti einstaka prosentlønta (fiski- og útróðrarmanninum).

Fiskivinnuráðið hevur, við optimistiskum veiðitølum og optimistiskum prísum, roknað seg fram til at fiskivinnan á sjónum kann skerjast við upp til í mesta lagi 30 milliónir. Tað sýnist ikki sum ráðið hevur tikið hædd fyri, at eitt í ringum tíðum upparbeitt hall skal afturgjaldast við avlopi í góðum tíðum.

Minnilutin loyvir sær at vísa til, at broytingin í § 6, 1. stk. h inniber, at opnir bátar aftur missa tann rakstrarstudning, teir fingu rætt til við lógarbroytingini seinasta ár,

og metir hetta at vera eitt óræittvist stig at taka ímóti teimum, sum lívbjarga sær við fiskivinnu, um enn far teirra einki dekk hevur. Likaleiðis skal minnilutin gera vart við, at garnaskipini eisini eftir uppskoti landsstýrisins missa studningin sambært § 6, 1. stk, h. Broytingin inniber, at garnaskip fara niður úr ávikavist 23 og 60 oyru í null, at tað sama ger seg galdandi fyri allar opnar bátar, meðan dekkfiskifør undir 110 brt fara úr 23 og 60 oyrum niður í ávikavist 19 og null oyru.

Minnilutin ger vart við, at tann í lóg nr. 39 frá 20. mai 1981 og lóg nr. 25 frá 18. mars 1980 umroddi eykastudningur eigur at avroknast soleiðis, at tann, ið ber kostnaðin av oljuútreiðslunum, fær fyrimunir av studningunum.

Minnilutin kann ikki góðtaka, at saltfiskastudningurin ikki verður latin fyri seinna túrin, við tað at ein tílík lógarbroyting kann javnmetast við eitt sáttmálabrot sæð frá einum fiskimannasjónarmiði.

Minnilutin heldur ikki løtuna at avtrappa studningin vera væl valda og leggur til galdandi lóg við ymsum broytingum fram sum

Broytingaruppskot
til

uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ *1.* Við tí endamáli at gera Lønjavningargrunn Skipsfiskimanna føran at veita manningini, her at skilja sum eisini skipari ella bátsformaður, á føroyskum fiskifari minstuløn og at veita annan stuðul til fiskivinnuna, verður á fíggjarløgtingslógunum veittur grunninum árligur studningur.

2. stk. Lønjavningargrunnurin setur í reglugerð tær gjøllaru reglurnar fyri minstulønini og hinum stuðlunum. Reglugerðin verður at senda landsstýrinum til góðkenningar.

Minstaløn og minstiforvinningur.

§ *2.* Treyt fyri, at persóni er tryggjað minstuløn, er, at hann er mynstraður eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag. Er engin tílíkur sáttmáli, er treytin fyri

§ *1.* Med det formål, at Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna er i stand til at yde besætningen, i denne lov omfattende også skipper eller bådsformand, på færøsk fiskerfartøj mindsteløn og at yde anden støtte til udøvelse af fiskerierhvervet, bevilges der fonden årlige tilskud på finanslagtingslovene.

St. 2. Lønjavningargrunnurin fastsætter i et reglement de nærmere bestemmelser for mindstelønnen og tilskudene. Reglementet forelægges landsstyret til godkendelse.

Mindsteløn og mindsteindtægt.

§ 2. Det er en forudsætning for, at der er sikret en person mindsteløn, at denne er påmønstret i henhold til overenskomst mellem Føroya Reiðarafelag og vedkommende fagforening. Så-

minstuløn, at mynstrað er eftir sáttmála millum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi yrkisfelag. Í undantaksførum hevur landsstýrið heimild at gera frávik frá hesum reglum.

§ *3.* Minstaløn*in* er pr. 1. apríl 1982 kr. 9.800 um mánaðin, eftir 1. mai tó hækkað við 2,5%, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg. Minstaløn*in* verður ikki skerd av manningarstuðninginum eftir hesi lóg. Minstaløn*in* verður hækkað við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig, pristalið er omanfyri 100. Fellur pristalið niður um 100, verður eingin pristalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

2 stk. Til fiskimann, ið mynstraður er fyri minni enn fullan part, verður minstaløn*in* veitt sum ein lutfalsligur partur av fullari minstuløn.

§ *4.* Manningin*i* á føroyskum deksfiskifari undir 100 brutto skrásett tons í útróðri innan fyri 100 fjórðingar úr landi í Føroyum verður, um hon ikki er undir minstulønarskipan, tryggjað ein minstaforvinningur. Minstaforvinningurin er pr. 1. apríl 1982 390 kr. til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin, eftir 1. mai tó hækkað við 2,5%.

2. stk. Minstiforvinningurin verður hækkaður við 8 ferðir 60 oyru fyri hvørji 3 stig, pristalið er omanfyri 100. Fellur pristalið niður um 100, verður eingin pristalsviðgerð. Dýrtíðarvið-

fremt en sådan overenskomst ikke foreligger, er mindstelønnen betinget af, at der er mønstret efter overenskomst mellem vedkommende reder eller ejer af skibet og vedkommende fagforening. I særlige tilfælde har landsstyret bemyndigelse til at dispensere frá disse bestemmelser.

§ *3.* Mindstelønnen er pr. 1. april 1982 kr. 9.800 om måneden, efter 1. maj stiger denn med 2,5% hver fangsttur regnet for sig. Mindstelønnen reduceres ikke ved mandskabstilskudene i henhold til denne lov. Mindstelønnen forhøjes med 105 kr. om måneden for hver 3 points, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsbehandling sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.

Stk. 2. Til fisker, der er pámønstret for mindre end en hel anpart, ydes mindsteløn som en forholdsmæssig del af fuld mindsteløn.

§ *4.* Der sikres mandskabet på færøsk dæksfiskerfartøj under 100 brutto reg. tons i hjemmefiskeri indenfor 100 sømil fra land af Færøerne, såfremt mandskabet ikke er under mindstelønsordning, en mindsteindtægt. Mindsteindtægten er pr. 1. april 1982 390 kr. til hver fisker, for hver fiskedag, efter 1. maj dog forhøjet med 2,5%.

Stk. 2. Mindsteindtægten forhøjes med 8 x 60 øre for hver 3 point, pristallet er over 100. Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsbehandling sted. Dyrtidsregulering finder sted

gerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

Manningarstudningur.

§ 5. Til manningina á føroyskum fiskifari verða veittir hesir studningar:

a. á trolara í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk uppskipað vekt.

b. á skipi við linu, gørnum, snøri ella snellu í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk uppvigað vekt.

c. á frystiskipi í svartkalva og/ella hemaraveiðu 45 oyru/kg uppvigað vekt.

d. á trolara í flakaveiðu 58 oyru/kg av kílaskornum flaki uttan skræðu uppvigað vekt, annars 48 oyru/kg og 30 oyru/kg fyri fars.

e. á deksfiskifari við linu ella snellu í feskfiskaveiðu 32 oyru/kg, tó fyri brosmu og longu 36 oyru/kg.

f. á trolara og á fiskifari við gørnum á feskfiskaveiðu 15 oyru/kg.

g. á opnum útróðrarbáti 40 oyru pr. kg. Hevur báturin bensinmotor, verður latið 10 oyru/kg eyka í studningi.

h. á fiskifari undir 20 brutto skrásett tons á silda- ella brislingaveiðu 25 oyru/kg, um veiðan fer til mjølframleiðslu, annars 1 kr./kg uppvigað vekt.

2. stk. Í teimum undir 1. stk. punkt e og g nevndu førum, har veiðan verður

hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.

Mandskabstilskud.

§ 5. Til mandskabet på færøsk fiskerfartøj ydes disse tilskud;

a. på trawlere i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg opvejet vægt.

b. på skib med line, garn, snøre eller snelle i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg opvejet vægt.

c. på fryseskib i fiskeri efter hellefisk og/eller haj 45 øre/kg opvejet vægt.

d. på trawler i filétfiskeri 58 øre/kg af kileskåret filét uden skind opvejet vægt, iøvrigt 48 øre/kg og 30 øre/kg af fars.

e. på dækfiskerfartøj med line eller snelle i fiskeri efter frisk fisk 32 øre/kg, dog for brosme og lange 36 øre/kg.

f. på trawler og dæksfiskerfartøjer med garn på ferskfiskefangst 15 øre/kg.

g. på åbne både 40 øre/kg. Har båden bensinmotor, ydes 10 øre ekstra i tilskud.

h. på fiskerfartøj under 20 tons brt på silde- eller brislingefangst 25 øre/kg, såfremt fangsten leveres til melproduktion, ellers 1 kr./kg opvejet vægt.

Stk. 2. I de under stk. 1, punkt e og g nævnte tilfælde, hvor fangsten ind-

avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella part av henni, og tann parturin, sum ikki kann virkast, beinanveg verður fluttur til næsta fiskavirki, verður latið 10 oyru/kg eyka fyri henda partin av veiðuni.

3. stk. Í teimum undir 1. stk., punkt a, b og d nevndu førum, har veiðan verður landað í aðrari havn enn føroyskari, verður bert hálvur studningur latin.

handles på steder, hvor der ikke er muligheder at tilvirke hele fangsten eller en del af denne, og den del, der ikke kan tilvirkes, straks transporteres til nærmeste fiskerianlæg, ydes der 10 øre/kg ekstra for denne del af fangsten.

Stk. 3. I de under stk. 1, punkt a, b og d nævnte tilfælde, hvor fangsten landes i anden havn end færøsk, ydes der halvt tilskud.

Rakstrarstudningur.

§ *6.* Til eigara av føroyskum fiskifari verða veittir hesir studningar:

a. trolari í saltfiskaveiðu 50 oyru/kg saltfisk uppvigað vekt.

b. frystiskip í svartkalva- og/ella hemaraveiðu 45 oyru/kg landað vekt.

c. trolari í flakaveiðu 58 oyru/kg av kílaskornum flaki uttan skræðu uppvigað vekt, annars 48 oyru/kg., tó 30 oyru/kg av farsi.

d. trolari, sum hevur ella fær veiðuloyvi uttan fyri føroysku landleiðina til saltfiska-, frysti- ella isfiskaveiðu á feskfiskaveiðu á føroyskum, útlendskum ella altjóða sjóøki 10 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu upsa, kongafisk og svartkalva 47 oyru/kg, um hesi fiskasløgini eru veidd á føroysku landleiðini.

e. Trolari við upp til 1400 hk høvuðsmaskinu, sum ikki kemur undir fyrisetningarnar í punkt d í feskfiskaveiðu á føroysku landleiðini uttanfyri 12 fjórðingar úr grunnlinjunum, og trolarar á iðnaðarveiðu við feskfiski sum hjáveiðu, av hesi

Driftstilskud.

§ *6.* Til ejer af færøsk fiskerfartøj ydes disse tilskud:

a. trawler i fiskeri efter saltfisk 50 øre/kg opvejet vægt.

b. fryseskib i fiskeri efter hellefisk og/eller haj 45 øre/kg landet vægt.

c. trawlere i filétfiskeri 58 øre/kg af kileskåret filét uden skind opvejet vægt, iøvrigt 48 øre/kg.

d. Trawler, som har eller får fangsttilladelse uden for det færøske fiskeriterritorium til saltfiske-, fryse- eller isfiskefangst, på ferskfiskefangst på færøsk, udenlandsk eller internationalt søterritorium 10 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 47 øre/kg, såfremt disse fiskesorter er fanget på færøsk fiskeriterritorium.

e. Trawler med op til 1400 hk hovedmaskineri, som ikke kan henføres under foresætningerne i punkt d på ferskfiskefangst på det færøske fiskeriterritorium uden for 12 sømil fra grundlinierne, og trawlere på industrifangst med fersk fisk som bifangst, af denne fangst 36 øre/kg, dog

veiðu 36 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 73 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini. Fyri trolarar við høvuðsmaskinu uppá 1400 hk ella yvir, verður studningurin ávikavist 43 oyru/kg og 80 oyru/kg.

f. fiskifari við trolloyvi til feskfiskaveiðu nærri landi enn 12 fjórðingar úr grundlinjunum 73 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 60 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini

g. fiskifør 110 brutto skrásett tons og yvir í feskfiskaveiðu við línu og snellu 43 oyru/kg, tó fyri brosmu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 80 oyru/kg, um hesi fiskasløgini eru veidd á føroysku landleiðini.

h. Øll garnaskip, og fiskifør undir 110 brt í línu-, snøris- ella snelluveiðu 23 oyru/kg, tó fyri brosmu, longu, blálongu, upsa, kongafisk og svartkalva 10 oyru/kg, um hesi fiskasløg eru veidd á føroysku landleiðini.

i. 100% av frítíðarlønini, sum eigari letur av minstulønini og manningarstudninginum eftir § 5.

3. stk. Í teimum undir punkt a og c nevndu førum, har veiðan verður landað í aðrari havn enn føroyskari, verður bert hálvur studningur latin.

for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 73 øre/kg, såfremt disse fiskearter er fisket på færøsk fiskeriterritorium. For trawlere med hovedmaskineri på 1400 hk eller derover bliver tilskudet henholdsvis 43 øre/kg og 80 øre/kg.

f. fiskefartøj med trawltilladelse til ferskfiskefangst nærmere land end 12 sømil fra grundlinierne 23 øre/kg, dog for brosme, lange, blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 60 øre/kg såfremt disse fiskesorter er fanget på færøsk fiskeriterritorium.

g. fiskerfartøj, 110 brt og større i fiskeri efter frisk fisk med line 43 øre/kg, dog for brosme, lange blålange, storsej, rødfisk og hellefisk 80 øre/kg, såfremt disse fiskesorter er fanget på færøsk fiskeriterritorium.

h. alle garnskibe, og alle fiskerfartøjer under 110 brt i line-, snøre- eller snellefangst 23 øre/kg, dog for brosme, lange, storsej, rødfisk og hellefisk 60 øre/kg såfremt disse fiskesorter er fanget på færøsk fiskeriterritorium.

i. 100% af ferielønnen, som ejer betaler af mindstelønnen og mandskabstilskudet efter § 5.

Stk. 3. I de under punkt a og c nævnte tilfælde, hvor fangsten landes i en anden havn end færøsk ydes der halvt tilskud.

Felagsregur v.m.

§ 7. Studningurin eftir § 5, 1. stk. punktini e, f og g og § 6, 1. stk.

Fællesbestemmelser m.v.

§ 7. Tilskudene i henhold til § 5, stk. 1, punkterne e, f og g og § 6, stk. 1,

punktini d, e, f, g og h verður bert latin fyri rundan fisk, kruvdur við høvdi, sum er blóðgaður og væl reinsaður og avreiddur í Føroyum.

§ 8. Hóast skipari ella annar av manningini eftir sáttmála fær meira enn manspart, verður studningurin til haun bert roknaður av einum mansparti. Skipari fær bert lutfalsliga í studningi so mikið, at vinningur hansara ikki kemur upp um 10.000 kr. við einum mánaði sum grundarlag. Annars lutaka allir av manningini við sama parti í studningsveitingini eftir § 5. Er mynstrað fyri minni enn heilan part, fær viðkomandi lut í mun til partin. Í sjálvdráttarveiðu verður býtið at laga seg eftir teimum býtisreglum, sum nýttar eru í hesum veiðuhátti.

§ 9. Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1982, og samsvndis fara úr gildi lóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, sum lógin er broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 20. mai 1981.

punkterne d, e, f, g og h ydes kun for rund fisk med hoved uden indvolde, der er strubeskåren og godt renset og indhandlet på Færøerne.

§ 8. Uanset skipperen eller andre af mandskabet efter overenskomst får mere end en mandskabsandel, bliver tilskudet til vedkommende kun at beregne af en mandskabsandel. Skipperen får kun forholdsmæssigt så meget i tilskud, at hans fortjeneste ikke overstiger 10.000 kr. med en måned som grundlag. Iøvrigt deltager hele mandskabet med samme andel i tilskudsydelserne efter § 5. Er der mønstret for mindre end en hel andel, får vedkommende tilskud i forhold til andelen. Ved enkeltmandsfiskeri retter fordelingen sig efter de fordelingsregler, som anvendes under denne fangstform.

§ 9. Denne lov får gyldighed fra 1. april 1982 og samtidig træder lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet, som ændret ved lagtingslov nr. 34 af 20. maj 1981 ud af kraft.

Minnilutin í figgjarnevndini (Ove Mikkelsen, Atli P. Dam og Adolf V. Hansen) setir fram soljóðandi

Í BROYTINGARUPPSKOT

Sum nýggj § 8 í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn v.m. verður sett:

§ 8. Landsstýrinum verður heimilað saman við figgjarnevndini lands-

kassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 10 mió. kr. Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru tær somu sum í galdandi lóg nr. 7 frá 24. februar 1981.

§§ 8, 9 og 10 verða §§ 9, 10 og 11.

Meirilutin í fíggjarnevndini (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen og Hilmar Kass) setir fram soljóðandi

II BROYTINGARUPPSKOT

Sett verður sum nýggj § 8:

§ 8. Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1982/83 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 10 mió. kr. Treytin, fyri at veðhald kann verða veitt, er, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 15% av tí upphædd, ið veðhald verður veitt fyri.

§§ 8, 9 og 10 verða §§ 9, 10 og 11.

Sama dag setti oislni Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

BROYTINGARUPPSKOT

Sum nýggj § 7 verður sett:

»*§ 7.* Á virkjum, har útflutningsskipið ikki kann koma so nær virkinum, at

»*§ 7.* På fiskerianlæg, hvor eksportskibet ikke kan komme så nær til

útflutningsvørrnar kunnu koma at skipssiðu við akfari, verður yvir ráfiskagrunnin endurgoldið tílíkum virkjum 20 oyru/kg ráfisk.

2. stk. Henda regla er galdandi til 1. november 1982.«

§§ 7, 8 og 9 verða ávikavist §§ 8, 9 og 10.

fiskerianlæg, at eksportvarerne ikke kan fremføres til skibsside med køretøj, ydes over råfiskefondet en godtgørelse til sådanne fiskerianlæg 20 øre/kg råfisk.

Stk. 2. Denne regel har gyldighed til 1. november 1982.«

§§ 7, 8 og 9 bliver henholdsvis §§ 8, 9 og 10.

2. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen og Ova Mikkelsen til § 1 fall við 8-0. Broytingaruppskot frá Jørgen Thomsen pkt. 1 fall við 9-0, pkt. 3 við 9-0, pkt. 5 við 7-0, pkt. 6 við 15-0, pkt. 7 við 14-0, pkt. 8 við 15-0 og pkt. 9 við 8-0. Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini til uppskot I pkt. 1 samtykt við 32-0, pkt. 2 við 31-0, pkt. 3 við 17-4, pkt. 4 við 22-0, pkt. 5 við 19-0, pkt. 6 við 17-0, pkt. 7 við 20-0, pkt. 8 við 19-0, pkt. 9 við 22-0, pkt. 10 við 19-0, pkt. 11 við 28-0, pkt. 12 til og við 16 samtykt við 17-0. Landsstýrisins uppskot I soleiðis broytt samtykt við 19-0 atkvøðum.

Broytingaruppskot frá meiriluta í figgjarnevdnini til II, § 1 samtykt við 27 0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 19-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

Landsstýrisins uppskot III samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð sama dag á seinni fundi. Málið sum samtykt við aðru viðgerð endaliga samtykt við 18-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1517-2-1. Lógirnar nr. 69, 70 og 71 frá 21. mai 1982.

---

144. Friðing av skúgvi.

Ár 1982, týsdagin 16. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum, gongur í § 17, stk. 2, a) orðið »skúgvur« út.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ *1.* I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. udgår i § 17, stk. 2, a) ordet »storkjove«.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Skúgvur varð í 1897 friðaður aftaná at stovnurin var komin niður í 4 pør. Friðingin stóð við til 1969, tá hann var nógv nærdur aftur og varð mettur at gera stóran skaða á annan fugl.

Stovnurin verður nú mettur aftur at vera í minking. Eftir fuglateljingini í 1981 varð funnið fram til 239 pør, meðan talið í 1961 var 530 pør.

Viðlagt fylgja áheitanir frá Fiskirannsóknarstovuni, Náttúrugripasavninum og øðrum um friðing av skúgvinum og tekur landsstýrið undir við tilmælunum.

+ skjøl

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
Debessartrøð
3800 Tórshavn - Føroyar
(Faroe Islands) Tlf. 15092

10. februar 1982.

Harra J.P. Ellendersen
Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn

Vísandi til bræv F.L.j.nr. 610-9-2 dagfest 22. januar 1982 viðvíkjandi spurningi, um skúgvurin eigur at vera friðaður, loyvi eg mær at viðleggja kopi av skrivi, ið lýsir mína hugsan í hesum máli.

Heilsan
Andrias Reinert

Viðv. uppskoti um aftur at friða skúgvin.

Í 1954 metti íslendski fuglafrøðingurin F. Gudmundsson, at stovnurin av skúgvi í Norðuratlantshavi var umleið 7.200 pør og at 6.000 av hesum áttu á Íslandi.

Á norðaru jarðarhálvu hevur skúgvur bert átt á Íslandi, í Føroyum og Norður skotlandi.

Serstakliga í Hetlandi, men eisini í Føroyum er skúgvurin nógv nørdur, síðani hann var friðaður. Frá miðskeiðis í 50'unum er hann harafturímóti minkaður á Íslandi (sí viðløgdu talvu).

Úr 200 pørum í 1946 var talið av skúgvi í Føroyum komið upp á 530 pør í 1961. Hetta var helst hildið at vera ov nógv, og tí var friðlýsingin avtikin í 1972.

Fuglateljingin í 1981 vísti, at nú eiga bert 239 skúgvapør eftir í Føroyum. T.v.s. at stovnurin er komin niður á sama støði, sum hann var, tá talt var í 1946.

Ilt er at meta um orsøkirnar til hesa minking. Hetta tíðarskeið hevur sum kunnugt eisini hóttafall verið á lomviga, rytu og tjógva.

Dúliga hevur tó skúgvurin verið jagstraður á búplássunum, síðani friðingin var avtikin.

Eingin orsøk er at minka enn meira um stovnin, og vil eg tí taka undir við uppskotinum um at fáa skúgvin friðaðan aftur.

Andrias Reinert.

P.S.: Í 1970 áttu meira enn 3.000 pør av skúgvi í Hetlandi, meginparturin á oynni Foula, har 1.780 pør vóru tald. Hóast hetta er meira enn 10 ferðir so nógvur skúgvur, sum eigur í Føroyum í dag, sær ikki út til, at hesin fuglur ávirkar aðrar fulgastovnar nevnivert í Hetlandi — og her fara støðugt fuglakanningar fram. Heldur ikki frættist nakað um, at hann er til bága fyri seyðahaldið.

Skúgvur er friðaður í Bretlandi.


SKÚGVUR, fuglateljingar.

	Hetland	Føroyar	Ísland
	Foula		Breiðamerkursandur
1744	6 pør		
1892	120 pør		
1897		4 pør	
1938	300 pør		
1946		200 pør	
1948-51	4-500 pør		
1954			1.500 pør
1961		530 pør	
1962			8.500 pør
1963	900 pør		400 pør (uml.)
1969-70	1.780 pør		
1981		239 pør	


Áheitan um heildarfriðing av skúgvi.

Við hesum verður tikin uppaftur áheitan um friðing av skúgvi, sum Andrias Reinert og Dorete Bloch settu fram í brævi dagf. 9. apríl 1980.

Við fuglateljingina summarið 1981 vórðu funnin tilsamans 239 pør av skúgvi, sum eiga her. Á hjáløgdu mynd eru merkt tey støð, har skúgvur eigur. Myndin vinstrumegin vísir, hvar skúgvur átti í 1961, myndin høgrumegin vísir, hvar hann átti í 1981.



Sum tað sæst, er talið á verpingarstøðum hjá skúgvi at kalla óbroytt, men í 1981 er talið av fugli, sum eigur her, minkað í stórum. Størsta afturgongdin er á Svínoynni, norðan fyri Saksun og á Skúvoynni.



Tekna vit eina kurvu, ið vísir, hvussu støddin á stovninum hevur verið — sí omanfyri — sæst skilliga, hvussu friðingin í 1897 hevur ávirkað stovnin. Hann er støðugt og líðandi vaksin í hvussu er fram til fyrst í 60-árini, tá ið tald vórðu 530 verpandi pør. Minkingin av verpingarfugli millum 1961 og 1981 er eisini eyðsýnd. At skúgvur hevur verið veiddur eftir at friðingin varð avtikin í 1971, hava vit so nógvar álitandi frágreiðingar um, at einki er at ivast í, at afturgongdin fyri ein part er komin av, at skúgvur hevur verið veiddur.

Skúgvur hevur altíð havt ringt orð á sær, og hann verður sagdur at vera skaðiligur fyri bjargafuglin, helst fyri lunda (smb. Mikkjal á Ryggi). Kanningar av føði hansara bæði her (Bayes et alt. 1964b) og aðrastaðni í Norðuratlantshavi (Furness, 1979), vísa, at skúgvur livir einamest av nebbasild og ritu, og hann tekur bæði egg, ungar og vaksnan ritufugl.

Harumframt tekur skúgvur her eisini í stóran mun: aðrar skúgvar, ternu, kjógva, og í minni mun eru leivdir fumar av havhesta-, tjaldur-, spógva-, og limvigaeggjum, eini haru, lomviga, lunda, skarvi og smáum landskordýrum. Tað hevur ikki borið til at siga, um skúgvurin sjálvur hevur tikið haru, skarv og lomviga, ella um hann hevur tikið ræ við sær.

At døma eftir fuglateljingini í 1981 eru eingi tekin til, at havhesta-, tjaldurs- og spógvastovnar eru í vanda av ti, at skúgvur tekur egg teirra; kanningin hjá Bayes ber at sama borði, tí hon vísir, at hetta ikki er týdningarmesta føði hansara.

Sjálv ivist eg ikki í, at skúgvur — og partvist eisini ravnur — verða lagdir undir at gera tað spell, sum teir stóru másafuglarnir og fyri ein part eisini kattar, sum reika um í høgunum, eiga skyldina fyri. Her má havast í huga, at teir stóru másafuglarnir — líkka, fiskimási og svartbakur — hava nørst í stórum í hesari øldini, og kemst tað fyri ein part av, at nøgdin av slógvi, sum er atkomiligt hjá fugli, er nógv vaksin, og eisini føða teir seg av burturkasti og rottum á ruskstøðunum.

Hyggja vit at kurvuni á 2. síðu, sum vísir talið á skúgvi gjøgnum árini, er eyðsæð, at verður hildið fram at veiða skúgv, kemur stovnurin um fá ár niður á tað hann var, tá ið friðingin kom í 1897, nevniliga 4 pør.

Við tað at tað er eitt altjóða ynski at fáa skúgv heildarfriðaðan, sí álit frá Europaráðnum (F.L.j.nr. 2207-5-2) og hjálagda ljósprent av brævi frá Chr. Impoden, ICBP, vóni eg, at landsstýrið tekur undir við, at vit treyðugt vilja vera henda sermerkta fulg fyriuttan, og tí vil gera sítt til at fáa hann heildarfriðaðan.

Víst verður til hesar bókmentir:

Bayes et. al.: 1964a. The distribution and numbers of the Great Skua breeding in the Faeroes in 1961. — Dansk Ornithologisk Forening 58, p:36-42.

Bayes et. al.: 1964b. The food and feeding behaviour of the Great Skua in the Faroes. — Bird Study 1. p:272-279.

Furness, R. W.: 1979. Foods of Great Skuas at North Atlantic breeding localities. — Ibis 121, p:86-92.

Dorete Bloch.

Fróðskaðarsetur Føroya

Tórshavn 9.4.1980

Anmodning om totalfredning af Storkjove (Skúgvi) — Stercorarius skua.

Efter lov nr. 33 á 7. juni 1972 blev Storkjoven igen optaget paa Jagtloven efter at have været totalfredet siden 1890'erne. I de firs aar bestanden var fredet, gik den frem fra 4 par i 1890'erne til mindst 500 par (optælling i 1961).

I de senere aar er bestanden gaaet stærkt tilbage.

Denne tilbagegang er utvilsomt delvis naturbestemt, og kan blandt andet sættes i forbindelse med ridebestandens svigtende ynglesuccess i en aarrække. Men fuglen er desuden meget saarbar overfor jagt: Ynglebestanden talte trods alt kun få 100 fugle i 1960'erne, og ynglepladserne er meget let tilgængelige. Storkjoven har flere steder siden fredningens ophør været udsat for et overdrevent jagttryk i form af nedskydning af gamle fugle og ødelæggelse af reder med æg/unger. Saaledes bestaar kolonien i Svínaskoradalur nu af højst 50 par (talt 1973), hvor den i 1961 var landets største paa 232 par. Paa Svínoy var landets næststørste koloni paa ca. 200 par i 1961, og nu er den næsten drevet væk.

I Europaraadskommisionens betænkning »Protection of Wildlife« (Journal nr. 2207-5-2 i Landsstyret) dette aar medregnes Storkjoven som en fugl, der ønskes totalfredet generelt (liste VI). Inden denne fugl, der er en saa karakteristisk del af fuglelivet i den færøske udmark, igen forsvinder herfra, vil vi anmode Landstyret om endnu engang at faa den fjernet fra jagtloven.

Andrias Reinert *Dorete Bloch*

Medlemmer af ICBP (International Conceil for Bird Protection). Kopi sendt til ICBP.

International Council For Bird Preservation

Landstyrismadur Pall Vang
Foroya Landstyri
3800 Torshavn
The Faroes

9 March 1981

GREAT SKUAS, FAROE ISLANDS
Dear Landstyrismadur Vang

I have the honour to write to you on behalf of the International Council for Bird Preservation to draw to your attention the concern expressed by the Conference of the ICBP European Section held in Malta in November 1980 at the newly introduced regulation which was reported to have led to an immediate and sharp decline in the breeding population on the Faroes of this vulnerable species. Delegates at the Conference urged the immediate cessation of this shooting and for full protection to be given to this species.

In thanking you for your consideration of the representations made by this Conference, I would like call attention to the position of ICBP, the world's longest established international conservation organisation, which comprises 65 national sections representing over 250 constituent member organisations with over 1.5 million members.

Yours sincerely

Christoph Imboden
Director

b.c. Jan Dyck
Mrs. Dorete Bloch

Arne Nørrevang
p.t. Fróðskaparsetur Føroya

Tórshavn, 18. februar 1982

Føroya Løgting
Tórshavn

Viðv. uppskoti um friðing av skúgvi.

Skúgvurin er fuglur, sum hevur livað í Føroyum so leingi, sum nakar veit um. Svabo sigur, at í farnari tíð vóru 6000 pør á Skúvoynni, men helst man tað hava verið søgn.

Skúgvur finst bert á einum lítlum øki í Atlantshavinum frá Orknoyggjum og norðureftir til nøkur fá pør, sum nýliga eru komin at eiga í Jan Mayen. Alheimsstovnurin av skúgvi er sostatt avmarkaður, og noyðast vit ti at fara væl við

honum. Nærmastu skyldfuglar hjá skúgvi finna vit á leiðunum kring Suðurpólin, og helst er Norðuratlantiski stovnurin ein avleggari haðani, sum gjøgnum øldir er vorðin heilt sjálvstøðugur. Dømi um, at djórasløg liva heilt norðarlaga og heilt sunnarlaga, men ikki á leiðunum, ið liggja her ímillum, eru fá. Skyldfuglar hjá ternu okkara eiga á smáum oyggjum í Suðurindiska havinum. Hetta vísir, at stovnurin av skúgvi hevur stóran vísindaligan týdning.

Í 1897 vóru bert 4 pør eftir í øllum Føroyum, av tí at skúgvurin hevði verið jagstraður. Menn søgdu, at skúgvur var skaðiligur fuglur; men soleiðis hava teir gomlu ikki altið sagt. Debes t.d. sigur: »De skadelige ere Ugler, Spurre-høger, Krager og Ravne.« Ikki heldur nýggjar kanningar kunnu vísa á stóran skaða av skúgvi, um enn vit mugu viðganga, at onkur síðlembingur ella brekað lamb í onkrum føri er tikið av skúgvi.

Tað er so við og við vorðið almannakunnugt, at rovdýr hoyra við í náttúruhúsarhaldinum og gera gagn við at halda javnvág í náttúruni. Í grannalondum okkara eru rovfuglar friðaðir.

Eg skal sostatt mæla til, at skúgvur verður friðaður aftur, soleiðis sum Dorete Bloch hevur skotið upp.

Við hávirðing
Arne Nørrevang

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av Føroya landsstýri og undir 1. viðgerð tann 26. mars 1982 beint í umhvørvisnevndina.

Undir viðgerðini í umhvørvisnevndini hevur nevndin innkallað Dorethu Block Danielsen at geva nevndini upplýsingar um støðuna hjá teimum ymisku fuglasløgunum í Føroyum. Tá málið er rættiliga umfatandi, var semja í nevndini um at biðja Dorethu Block Danielsen um eina skrivliga heildarmetan og uppskot um, hvussu vit best varðveita hvørt einstakt fuglaslag.

Hetta arbeiðið tekur tíð, og setir tí ein samd umhvørvisnevnd fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at umhvørvisnevndin verður vald av nýggjum á ólavsøku,

og verður álagt nýggju nevndini tá at taka til viðgerðar málið um friðing av ymiskum fuglasløgum.

F.L.j.nr. 610-9-2.

145. Grannskoðan av almennum roknskapum.

1 TJALDURS APOTEK

Ár 1982, týsdagin 16. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

ÁLIT

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi roknskapir hjá Tjaldurs Apoteki saman við viðfylgjandi viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum:

Tjaldurs Apotekið 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:
Tjaldurs Apotekið 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/1981.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar fyri Tjaldurs Apotekið, meginapotekið í Tórshavn og deildirnar í Klaksvík og á Tvøroyri fyri árini 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.

Grannskoðararnir hava ásannað, at konti fyri kreditorar og debitorar eru avstemmaðar og gjøgnumgingnar fyri tapsvanda.

Vørugoymslurnar eru upptaldar og útroknaðar, eins og prísir eru ásettir av starvsfólkum, leiðslu og cand.pharm. Jørgen Laurberg, Danmark. Somuleiðis eru kassaeftirlit gjørd.

Byggiroknskapur fyri nýggja bygningin í Tórshavn er gjøgnumgingin fyri hvørt árið sær, og vísir grannskoðaranevndin til frásøgn frá roknskapargrannskoðarum, at endaligur byggiroknskapur kann væntast at fyriliggja innan næsta fíggjarárslok.

Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at roknskapargrannskoðarin hjá apotekinum í

frágreiðing fyri fíggjarárið 1977/78 heitir á Føroya landsstýri um at bera so í bandi, at rakstur apoteksins kann hvíla í sær sjálvum. Roknskapargrannskoðarin mælir til triggjar møgulligar loysnir:

1. At hækka prísirnar á apoteksvørum.
2. At rationalisera umsiting og rakstur.
3. At fíggja hallið yvir løgtingsfíggjarlógina.

Eftir roknskapinum at døma kemur hetta úrslit av prishækkingum ikki til sjóndar fyrr enn í roknskaparárinum 1979/80 og 1980/81, tá tað eydnaðist at minka hallið, so at samlaða rakstrarúrslitið 1980/81 kemur niður á 155.984,53 í halli, harav apotekið í Tórshavn hevur kr. 209.152,15 í halli, apotekið á Tvøroyri kr. 22.719,77 í halli, meðan apotekið í Klaksvík hevur kr. 75.887,38 í vinningi.

Ásannandi, at hetta úrslitið sum heild er betri enn raksturin 1978/79, tá samlaða hallið var kr. 1.260.047,34 alt, harav apotekið í Tórshavn hevði kr. 1.306.841,41 í halli, apotekið á Tvøroyri hevði kr. 33.486,83 í halli, meðan apotekið í Klaksvík hevði 80.280,90 í vinningi, halda løgtingsgrannskoðararnir ikki hetta úrslit vera nóg gott.

Løgtingsgrannskoðararnir meina, at apotekini hava bøtt um rakstrarúrslitið við at fylgja fyrstu tilráðing roknskapargrannskoðarans, nevniliga at hækka prísirnar. Einki bendir á, at tilráðing nr. 2, nevniliga at rationalisera umsiting og rakstur, er fylgd.

Løgtingsgrannskoðararnir hava bitið merki í, at apotekið í Klaksvík øll árini uttan 1979/80 hevur havt eitt rakstraravlop, meðan apotekið á Tvøroyri, ið hevur sama umsetning (og tal á viðskiftafólkum) sum tað í Klaksvík, hevur havt hall øll árini. Nevndin hevur kannað orsøkina til hetta, og er komin eftir, at apotekið á Tvøroyri hevur eitt starvsfólk meira enn tað í Klaksvík. Ein atvoldin til hetta støra starvsfólkatal sigst vera, at apotekið á Tvøroyri framleiðir meira av sínum heiligvági burtur úr rávøru.

Í fíggjarárinum 1980/81 eru lønarútreiðslurnar hækkaðar meir enn árini frammanundan, lutvíst orsakað av føroyskum lønarsáttmálum, og er hetta ein av orsøkunum til tað vánaliga rakstrarúrslitið.

Grannskoðaranevndin mælir til at fylgja roknskapargrannskoðarans tilráðing nr. 2, nevniliga at rationalisera umsiting og rakstur, av tí at apotekini í Tórshavn og á Tvøroyri eiga at kunna verða rikin við avlopi, tá Klaksvíkar apotek verður tað. Løgtinggrannskoðararnir vísa á, at hækking av prísum sum einasta rakstrarbøtandi loysn fellur tyngri á teir brúkarar av apoteksvørum, ofta eldri, sum hava heilivág mest fyri neyðini. Prishækkingar eiga tí at raka minst neyðsynjarmedisin.

Annars vísir nevndin løgtinginum á kunngerð nr. 542 frá 11. november 1976 um fólkapensión, ið heimilar ískoytishjálp til medisinkeyp.

Samburt lóg er tað apoteksgrunnurin, sum rekur føroysku apotekini.

Í apoteksroknskapinum eru eisini bygningarnir við, eins og renta verður áløgd apotekinum av millumrokningum við apoteksgrunnin.

Roknskapargrannskoðarin mælir til, at bygningarnir og lánini í samband við teir verða tikin úr apoteksroknskapinum og flutt yvir til grunnin. Í staðin fyri avskrivingar og rentur í apoteksroknskapinum skulu apotekini rinda eina árliga húsaleigu til grunnin fyri nýtslu av bygningunum.

Hesi tilmæling roknskapargrannskoðarans tekur grannskoðaranevndin undir við, tó soleiðis at samsvar er millum leigu og rentur og avdrátt hjá grunninum.

2. viðgerð 22. mars. Atkvøðugreiðsla 30. mars. Uppskotið varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

2 LØNJAVNINGARGRUNNURIN, RÁFISKAGRUNNURIN, TRYGDARGRUNNUR VEIÐIMANNA, FÆRØERNES OVERFORMYNDERI

Ár 1982, mánadagin 22. mars løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

ÁLIT

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi rokuskapir saman við viðfylgjandi viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.
2. Ráfiskagrunnurin 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.
3. Trygdargrunnur Veiðimanna 1979/80 og 1980/81.
4. Færøernes Overformynderi 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 og ásannað, at roknskapargrannskoðanin av grunninum er forsvarlig.
Stakroyndir hava prógvað samsvar millum skjøl og bókføring grunnsins.
Kontoir grunnsins í peningastovnunum eru avsteinmaðar eins og millumverandi við landskassan.
Kassaeftirlit hava verið, eins og tað skal.

Útreiðslur grunnsins eru økt úr 34,9 milj. kr. í 1976/77 upp í 97,9 milj. kr. í 1980/81, og inntøkur grunnsins úr landskassanum tilsvarandi.
Trýstið á grunnin var serliga hart í 1980/81, so at við fíggjarárslok hevði grunnurin útgoldið 41,781 milj. kr. meir í netto, enn grunnurin hevði fingið úr landskassanum.
Grannskoðararnir hava fingið upplýst, at likviditetur grunnsins síðan tá er batnaður almikið, soleiðis at hann í dag er forsvarligur, ella at samsvar er millum nýtslu og útgjald úr landskassanum.
Ansast má eftir, at neyvt samsvar er millum inntøkur og útreiðslur grunnsins frameftir.

2. *Ráfiskagrunnurin 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Ráfiskagrunninum fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 og ásannað, at roknskapargrannskoðanin er forsvarlig. Kontoirnar eru avstemmaðar við peningastovnarnar, eins og studningurin frá landskassanum um Lønjavningargrunnin. Virksemi grunnsins er økt úr 17 milj. kr. í 1977/78 upp í 80 milj. kr. í 1980/81.
Øll árini uttan 1978/79 varð avsett í tiltaksgrunn, 4 milj. kr. í 1977/78, 10 milj. kr. í 1979/80 og 12 milj. kr. í 1980/81.
Til virkini varð alt útgoldið 15,065 milj. kr. í 1977/78, 44,877 milj. kr. í 1978/79, 48,336 milj. kr. í 1979/80 og 67,709 milj. kr. í 1980/81.
Likviditetur grunnsins var strammur øll árini, og átti grunnurin tilgóðar hjá landskassanum 5,1 milj. kr. í 1977/78, 3 milj. kr. í 1978/79, 9 milj. kr. í 1979/80 og 23,9 milj. kr. í 1980/81. Henda tilgóðahavandi studning hevur grunnurin fingið fluttan hvørt fylgjandi fíggjarár. Nú er likviditeturin hjá grunninum betri. Tilgóðahavandi studningur er í løtuni umleið 4,6 milj. kr.
Samanlagt er avsett 200 milj. kr. í 1981/82. Av teimum er goldið 173 milj. kr. Eftirstøðan er 27 milj. kr. Samanlagt verður mett, at báðir grunnarnir í 1981/82 koma at kosta landskassanum 193 til 196 milj. kr.
Av teim avsettu 200 milj. kr. skal Ráfiskagrunnurin hava 72 milj. kr. Av hesum hevur hann fingið 55,2 milj. kr.
Grannskoðararnir taka undir við roknskapargrannskoðaranum, at Føroya landsstýri má fáa greiðu á ti formellu ábyrgdini viðvíkjandi kostnaðinum av fyrisiting Ráfiskagrunnsins.

3. *Trygdargrunnur Veiðimanna 1979/80 og 1980/81.*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Trygdargrunni Veiðimanna fyri fíggjarárini 1979/80 og 1980/81 — og ásannað, at grannskoð-

anin av roknskapi grunnsins virkar.
Innistandandi peningur er avstemmaður, eins og stuðningur frá landskassanum og flakavirkjum, og er alt í samsvar við upplýsingar frá Ráfiskagrunninum.

Ogn grunnsins er økt frá kr. 123.000,- við árslok 1979/80 upp í kr. 537.000,- við árslok 1980/81.
Grannskoðararnir varnaðust, at tilgóðahavandi grunnsins hjá virkjum pr. 31. mars 1981 var uppá kr. 167.426,-. Grannskoðararnir hava kannað spurningin um hesa útistøðu til tess at tryggja virkjum ímóti at koma í ov stóra eftirstøðu, og hava fingið váttað, at grunnsins tilgóðahavandi nú er fult inngoldið.

4. *Færøernes Overformynderi 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.*

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað ársroknskapirnar hjá Færøernes Overformynderi fyri fíggjarárini 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81.
Formyndaríið røkir sínar roknskaparligu skyldur samsvarandi lógini.
Løgtingsgrannskoðararnir hava ongar viðmerkingar.

2. viðgerð 22. mars. Atkvøðugreiðsla 30. mars. Uppskotið varð samtykt soleiðis: Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 og Ráfiskagrunnurin 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 samtykt við 27-0, Trygdargrunnur Veiðimanna 1979/80 og 1980/81 og Færøernes Overformynderi 1977/78, 1978/79, 1979/80 og 1980/81 við 29-0.

3 ÚTVARP FØROYA

Ár 1982, fríggjadagin 16. apríl løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

ÁLIT

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at goðkenna niðanfyri standandi roknskapir hjá Útvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1977/78 til og við 1980/81 saman við viðfylgjandi viðmerkingum.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum.
Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Útvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1977/78 til og við 1980/81 og ásannað, at roknskapargrannskoðanin av stovninum er farin fram sambært reglunum øll árini.

Inntøkur Útvarpsins eru øktar úr 3,889 milj. kr. upp í 5,546 milj. kr. hesi árini, meðan status stovnsins er øktur úr 6,182 milj. kr. upp í 22,266 milj. kr. í sama tíðarskeiði.

Orsøkin til tann lutfalsliga stóra vøksturin í status hjá stovninum er eyðvitað nýggju útvarpshúsini, sum eru uppførd í aktiv við 17,844 milj. kr. pr. ult. figgjarárið 1980/81.

Meðan útvarpsgjaldið fyri 1977/78 útgjørdi 1,865 milj. kr., kunngerðir fyri 1977/78 813 tús. kr. og V 4 inntøkur 722 tús. kr., broyttist inntøkumynstrið fram til 1980/81 soleiðis, at útvarpsgjaldið gav 3,305 milj. kr., kunngerðir 1,454 milj. kr., meðan V 4 inntøkan bert var 545 tús. kr. Rentuinntøkan í 1977/78 var 388 tús. kr. ímóti bert 147 tús. kr. í 1980/81.

Av hesum sæst, at meðan V 4 gav stovninum slakan fimting av samlaðu inntøkunum í 1977/78, taldi henda inntøka bert 1/11 av samlaðu inntøkunum í 1980/81. Meðan útvarpsgjald og kunngerðir eru nærum tvífaldaðar í krónum og oyrum, eru rentuinntøkur og inntøkur frá V 4 minni í krónum og oyrum í 1980/81 enn tær vóru í 1977/78.

Grannskoðararnir ásanna eftir upplýsingum frá Útvarpinum, at stovnurin leggur sína virkisskrá fyri árið eftir inntøkunum.

Eftir at nýggj útvarpshús nú eisini skulu forrentast, verður ikki møguligt hjá Útvarpinum bæði at klára rakstrarútreiðslur og forrentning uttan at útvarpsgjaldið hækkar úr verandi kr. 215,00 upp í 650,00, hetta sambært upplýsingar, grannskoðararnir hava fingið frá leiðslu Útvarpsins.

Løgtingsgrannskoðararnir gera einki tilmæli í spurninginum um inntøkur Útvarpsins og býti ímillum teir givnu møguleikarnar fyri hesum inntøkum. Gera bert Løgtinginum vart við ta støðu, Útvarpið er í.

Higartil hevur stovnurin við cinaræitti at uppkrevja útvarpsgjald og V 4 loyvi hvíli í sær sjálvum.

Nú sær út til at stovnurin má koma til landskassan í framtíðini, um ikki aðrir inntøkumøguleikar enn givnu finnast.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla annars til, at roknskapir Útvarpsins verða samtyktir saman við viðmerkingunum.

2. viðgerð 19. apríl. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

146. Fiskiveiði á landleiðini.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um fiskiveiði á landleiðini.

§ *1.* § 4 í løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiði á landleiðini verður strikað og í staðin verður sett:
»§ *4.* At skipa fyri fiskiskapinum við fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í kongaríkinum, er landsstýrinum saman við løgtingsins fiskivinnunevnd, heimilað við kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, tað er reglur um minstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskiháttir, avmarking av veiðunøgd, avmarking av veiðuorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk.

2. stk. Landsstýrinum er saman við løgtingsins fiskivinnunevnd heimilað við kunngerð at áseta serligar reglur til vernd av ungfiski. Landsstýrið og fiskivinnunevndin verða eisini heimilaðar at heimila Fiskirannsóknarstovuni við kunngerð at áseta bráfeingis bann fyri ávísar veiðihættir á vísum fiskileiðum á landleiðini, har ið Fiskirannsóknarstovan metir íblandingina av ungfiski í viðkomandi fiski-

lagtingslov om ændring af lagtingslov om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ *1.* § 4 i lagtingslov nr. 8 af 29. mars 1978 om fiskeri på fiskeriterritoriet udgår og i stedet indsættes:
»§ *4.* Med det formål at regulere fiskeriet fra fiskefartøjer hjemmehørende og registreret i kongeriget bemyndiges landsstyret sammen med lagtingets fiskeriudvalg, til ved bekendtgørelse at fastsætte regler om, hvordan fiskeriet skal udøves på fiskeriterritoriet, d.v.s. regler om mindstemål, fredede områder, fredningstider, regler om fiskeredskaber og deres brug, fiskerimetoder, begrænsning af fangstmængde, begrænsning af fangstindsats, regler om opdræt og omplantning af fisk og andre lignende foranstaltninger.
Stk. 2. Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets fiskeriudvalg ved bekendtgørelse at fastsætte særlige regler til beskyttelse af ungfisk. Landsstyret og fiskeriudvalget bemyndiges tillige til at bemyndige »Fiskirannsóknarstovan« ved bekendtgørelse at fastsætte bestemte midlertidige forbud mod bestemte fangstmetoder på bestemte fiskepladser, hvor »Fiskirannsóknarstovan« anser iblandingen af

skapi at hava avgerandi ávirkan á úrtøkuna frá ávísum stovnum. Bráfeingis veiðisteðgur kann ásetast at galda í upp til 7 samdøgur. Kunngerðir samb. 2. stk. kunnu lýsast í Útvarpi Føroya at galda 2 tímar eftir at tær eru lýstar, og skulu verða kunngjørdar í Dimmalætting beinan vegin.

3. stk. Reglur ásettar samb. 1. og 2. stk. verða at leggja fyri løgtingið eina ferð hvørja setu.«

ungfisk at have afgørende påvirkning på udbyttet af bestemte bestande. Midlertidigt fiskeriforbud kan foreskrives at gælde i op til 7 døgn. Bekendtgørelser i henhold til stk. 2 kan offentliggøres i Útvarp Føroya med gyldighed 2 timer efter, at de er kundgjort og skal kundgøres straks i Dimmalætting.

Stk. 3. Bestemmelser fastsat i henhold til stk. 1 og stk. 2 forelægges lagtinget een gang i hver lagtingssamling.

Viðmerkingar:

Sambært § 4 í lóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um fiskiveiði á landleiðini er landsstýrinum eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd heimilað við kunngerð at áseta reglur fyri, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, t.e. reglur um mitstamát, friðað øki, friðingartíðir, fiskireiðskap og nýtslu teirra, fiskilættir, avmarking av veiðinøgd, avmarking av veiðiorku, aling og flyting av yngli og onnur tílík tiltøk.

Henda lógargrein krevur, at landsstýrið leggur uppskot síni til kunngerðir um fiskireglur fyri fiskivinnunevnd løgtingsins, men krevur ikki samtykki nevndarinnar.

Landsstýrið metir tað vera betri í samsvar við parlamentariskan hugsunarhátt at krevja, at fiskivinnunevnd løgtingsins tekur undir við teimum tiltøkum, ið landsstýrið ætlar at seta í verk, soleiðis at ein meiriluti í fiskivinnunevndini ikki er ímóti tí, sum landsstýrið ætlar at gera.

Tí verður skotið upp, at orðingin »eftir samráð við« verður broytt til »saman við«.

Sambært § 4 kann landsstýrið áseta reglur um, hvussu fiskiskapur skal fremjast á landleiðini, í kunngerð frá landsstýrinum sjálvum.

Tað er meting landsstýrisins, at umframt hesar heimildir er neyðugt til tess at verja ungfiskin at fáa til vega heimild, ið landsstýrið kann lata fiskirannsóknarstovuni til at áseta bráðfeingis veiðisteðg til tíðir og á støðum, har iblandingin av ungfiski verður mett at vera so stór, at hon hevur avgerandi ávirkan á úrtøkuna av ávísum stovnum.

Skotið verður tí upp, at landsstýrið fær heimild til í kunngerð at áseta reglur, sum geva Fiskirannsóknarstovuni sum stovni heimild til, táið iblandingin av ungfiski av hesum verður mett at vera ov stór, at áseta bráðfeingis steðg fyri viðkomandi fiskiskapi.

Ætlan landsstýrisins er, at skiparar á deksførum skulu boða frá til Vaktar- og Bjargingartænastuna, sum síðan alt fyri eitt kannar málið og gevur frágreiðing um

tað til fiskirannsóknarstovuna, sum síðan kann áseta reglur um steðg í fiskiskapinum á einum avmarkaðum øki upp til 7 samdøgur.

Av tí at tað í slíkum førum er neyðugt at kunna bera skjótt at, verður miðað ímóti, at slíkur steðgur kann áleggjast við fáa tíma ávaring, nevniliga so skjótt sum boðini kunnu fáast fram til avvarðandi fiskiskip ígjøgnum Útvarp Føroya og síðani verða lýst á vanligan hátt í Dimmalætting.

Nærri reglur um, hvat ið skiljast skal við »ungfiski« og við »ov stóra iblanding« verður fiskirannsóknarstovan at gera av og at boða frá almennt við kunngerð.

Slíkar reglur sum tær, ið landsstýrið her skjýtur upp, hava verið galdandi í Íslandi og reyndar har við góðum úrsliti. Tað er metan landsstýrisins, at reglur sum hesar eru neyðugar, um so er, at tað skal eydnast at fáa botnfiskastovnarnar undir Føroyum upp á føtur aftur og at tryggja skynsama nýtslu av teimum í framtíðini.

1. viðgerð 26. mars. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 15. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 26. mars 1982 sama dag beint í fiskivinnunevndina.

Samd nevnd mælir til at samtykkja lógaruppskotið við hesum broytingum:
Í § 1, 3. stk. verða orðini »í Dimmalætting« strikað.

Nevndin viðmerkir samstundis, at kunngerðir smb. § 1, 2. stk. skulu altíð vera so rúmligar, at menn fáa neyðuga tíð til at fáa sín fiskireiðskap inn aftur.

2. viðgerð 19. apríl. Broyting frá nevndini til § 1 (§ 4, 2. stk.) samtykt við 29-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 30-0 atkvøðum.

3. viðgerð 21. apríl. Uppskotið varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1500-1-7-3/82 Lóg nr. 54 frá 6. mai 1982.

147. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Við 27-0 atkvøðum varð 19. mars 1982 samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum frá Erlendi Patursson, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Nær ætlar landsstýrið at steðga arbeiðinum við at leggja kloakk frá flogvøllinum í Vágum út á Sørvágsfjørð?

Viðmerkingar:

Kloakkin frá flogvøllinum í Vágum hevur higar til runnið út í opna á og haðani út á Sørvágsfjørð.

Av hesum skitna og eitraða vatni stóðst m.a. tað, at børn, sum svumu í tí gamla hylinum í ánni, fingu ekzem á kroppin. Kommunan noyddist tí at bróta svimjihylin niður.

Síl livdu ikki í ánni, seiður fekst ikki á seiðabergi og eingin hvítingur á hvítingsmiðinum.

Nú er so farið at gera kloakk frá flogvøllinum oman í Sørvágsbygd og nakað út á fjørðin.

Men so stutt kemur henda ætlaða kloakk, at renslið úr henni røkkur ikki út á streymasjógv, og kemur tað tí at dálka sjógvin á fjørðinum soleiðis, at alt lív har kemur í vanda fyri at doyggja.

Sørvingar kunnu ikki vera nøgdir við slíka oyðileggjandi dálking. Aðrar loysnir finnast: annað hvørt at føra kloakkina á Sørvágsfirði so langt út, at hon røkkur út á streymasjógv ella — og tað er besta loysnin — at føra hana út av Bøssdalafossi.

1. apríl svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Erlendur Patursson, løgtingsmaður, hevur sett mær henda spurning:

Nær ætlar landsstýrið at steðga arbeiðinum við at leggja kloakk frá flogvøllinum í Vágum út á Sørvágsfjørð?

Sum tað m.a. verður sagt í byrjanini av viðmerkingunum, hevur støðan viðv. kloakkering av flogvallaøkinum higar til verið soleiðis, at dálkað vatn hevur runnið út í

opnar veitir og løkir, ið annaðhvørt enda í Stórá, sum rennur á sandin og út á Sørvágsfjørð ella renna oman á Leitisvatn.

Økta ferðafólkatalið um flogvøllin, útbyggingin av flogvøllinum og byggingin av hotellinum hevur ført við sær, at nøgdin av dálkaðum vatni er vaksin seinastu árini, og var tað tí frá ymiskum síðum m.a. Sørvágs kommunu, heilsunevndini í Sørvági og landslæknastovninum borið upp á mál, at veita dálkaða vatnið burtur í rørum, soleiðis at vandin fyri umfarssjúkum varð minst møguligur.

Við hesum í huga varð farið undir at gera projekt og vóru fleiri uppskot til loysnir.

Av tí at valda loysnin gevur Sørvágs kommunu møguleika at veita stóran part av frárennslunum í bygdini í kloakkina — frárensl sum eins og í flestu føroysku bygdunum renna út í opnar veitir og gryvtir og fyrr ella seinni enda niðri í fjørðuni ella sjóvarmálanum — var hon tikin fram um aðrar, sum ikki góvu henda møguleika.

At føra kloakkina t.d. út av Bøssdalafossi hevði ikki givið Sørvágs bygd møguleikan, fyri eina ríminligari íløgu, at sloppið av við sítt egna kloakkvatn tann vegin.

Kloakkin fer í sjógv úti í Miðleitinum umleið 700 m uttan fyri norðastu húsini í Sørvági og verður hon løgd einar 30 m út frá landi. Sum vit vita, er størsti munurin á flóð og fjøru á Sørvágsfirði, og ger hetta saman við regni og vindi at vatnskifti í fjørðinum verður stórt, so neyvan man vera vandi fyri tí lívi, í fjørðinum er.

Mett verður, at skuldi kloakkin verið ført út á veruligan streymasjógv, so skuldi hon verið løgd heilt út til Bíggjar, og hevði kostnaðurin tá verið nógvar mill. kr. størri.

Samanumtikið má sigast, *at* valda loysnin veitir dálkaða vatnið frá terminalinum, hotellinum, bila- og flogfarastøðlum og — seinni — størra partinum av Sørvágs bygd burtur á ein tryggan hátt í eini afturlatnari rørskipan, at mett verður at vandin fyri eitran og týning av lívinum á Sørvágsfirði ikki er til staðar, og *at* landsstýrið ongar ætlanir hevur um at steðga arbeiðinum, sum nú er í gongd.

---

148. Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunn verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 7, nr. 4 verður orðað soleiðis:
»Veðskuldalán til endurnýggingar, umbyggingar og bjálving av sethúsum og íbúðum.«

2. § 8, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Til nýbygging av sethúsum og íbúðum kann grunnurin veita lán upp til 90% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir upp til 120 m², 75% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið eru yvir 120 m², men ikki størri enn 135 m², 45% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið eru yvir 135 m², men ikki størri enn 150 m². Hús og íbúðir størri enn 150 m² fáa einki lán úr húsalánsgrunninum.

3. Í § 11 ganga stk. 2 og 3 út.

4. § 12 verður orðað soleiðis:
»Lán til nýggj sethús og íbúðir verða veitt sum annuitetslán upp til 28 ár.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om boligfond.

§ *1.* I lagtingslov nr. 97 af 1. november 1978 om boligfond foretages følgende ændringer:

1. § 7, nr. 4 affattes således:
»Prioritetslån til fornyelse, ombygning og isolering af beboelseshuse og boligejendomme.«

2. § 8, stk. 1 affattes således:
»Til opførelse af beboelseshuse og boligejendomme kan fonden yde lån op til 90% af vurderingen til beboelseshuse og lejligheder op til 120 m², 75% af vurderingen til beboelseshuse og lejligheder, der er over 120 m², men ikke større end 135 m², 45% af vurderingen til beboelseshuse og lejligheder, der er over 135 m², men ikke større end 150 m². Boligfonden yder ikke lån til huse og lejligheder, der er større end 150 m².

3. I § 11 udgår stk. 2 og 3.

4. § 12 affattes således:
»Lån til nye beboelseshuse og lejligheder ydes som annuitetslån op til 28 år.«

§ *2. Denne lov træder i kraft straks.*

Viðmerkingar:

Eftir galdandi lóg um húsalánsgrunn, frá 1.11.1978, kann grunnurin veita lán upp til 90% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið hava upp til 120 m² av innrættaðari gólvvídd og 40% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið hava meir enn 120 m² av innrættaðari gólvvídd.

Í kunngerðini fyri húsalánsgrunnin verður definerað, hvat 120 m² av innrættaðari gólvvídd er.

Í hæddarmetrunum verður ikki roknað hjallur, tann parturin av kjallara, ið ikki er innrættaður at búgva í, tann parturin av reistari loftshædd, har hæddin undir loft er lægri enn 1,25 m, vaskirúm, onnur matgerðar- og matgoymslurúm enn køkur, hitarúm, bilhús og durur (vindfang).

Higartil hevur grunnurin ikki verið førur fyri at útvegað nóg mikið av peningi til at fíggja alla sethúsabyggingina, so sum lógin heimilar, og hevur tí verið neyðugt at avmarka lánupphæddina. Húsaláusgrunnurin hevur lænt 100.000 kr. til hús upp til 120 m² av innrættaðari gólvvídd og 60.000 kr. til hús, ið eru størri enn 120 m², definerað eftir galdandi reglugerð fyri Húsalánsgrunnin.

Eftir broytingaruppskotinum verður talan um fýra støddarbólkar, soleiðis at til nýbygging av sethúsum og íbúðum kann grunnurin veita lán upp til 90% av metingarvirðinum upp til 120 m², 75% av metingarvirðinum til sethús og íbúðir, ið eru yvir 120 m², men ikki størri enn 135 m². Ern húsini ella íbúðin yvir 135 m², men ikki størri enn 150 m², kann grunnurin veita 45% av metingarvirðinum. Hús og íbúðir størri enn 150 m² fáa einki lán úr húsalánsgrunninum.

Við heimild í lógini um húsalánsgrunn við hjáløgdu broytingum, er ætlan landsstýrisins at broyta kunngerðina um húsalánsgrunnin soleiðis, at í hæddarmetrunum verður íroknað:

Full stovuhædd. Eru fleiri hæddir enn stovuhædd, telja hesar fult við.

Víddin á hvørjari einstakari hædd verður roknað frá innsíðunum á útveggjunum.

Kjallari verður ikki roknaður til gólvvíddina.

Er eingin kjallari, kann fyri vanlig sethús loyvast, at upp til 20%, roknað av stovuhædd, verður lagt afturat mest loyvdu hæddarmetrum.

Loft, har hæddin frá loftsgólvi upp í mønu er hægri enn 2,20 m, verður talt við við 75% av gólvvídd, roknað frá vaðing, ið kann vera 1,25 m.

Ivamál kunnu í hvørjum einstøkum føri avgerast av stýrinum.

Sum omanfyri nevnt hevur vegna peningatrot verið neyðugt hjá húsalánsgrunninum at avmarka lánupphæddina.

Hetta verður framvegis neyðugt eina tíð enn. Ætlan landsstýrisins er at upphæddirnar, ið lænt verða til sethús og íbúðir eftir nýggju definitiónini av hæddametrunum verða 120.000 kr. til sethús og íbúðir upp til 120 m², 100.000 kr. til sethús og íbúðir, ið eru yvir 120m², men ikki størri enn 135m², 60.000 kr. til sethús og íbúðir, ið eru yvir 135m², men ikki størri enn 150 m² og sum nevnt í uppskotinum til lógarbroytingina verða eingi lán veitt úr húsalánsgrunninum til hús, ið eru størri enn 150m².

Soleiðis sum § 11 nú er orðað, skal afturgjaldingartíðin laga seg eftir inntøkuni.

Eftir at lógin hevur verið praktiserað gott 2 ár, hevur tað víst seg, at fyri eina meðal inntøku er afturgjaldingartíðin 28 ár.

Við tað, at afturgjaldingartíðin skal laga seg eftir inntøkuni, er neyðugt at kanna skattskyldugu inntøkuna hjá hvørjum einstøkum lántakara hvørt ár. Hetta gevur stórt umsitingarligt arbeiði, meðan munurin í árliga avdráttinum ikki verður so stórur fyri lántakaran, hóast stóran mun í skattskyldugu inntøkuni.

Rentan skal altíð gjaldast, og munurin millum árliga avdráttin, um skattskylduga

inntøkan t.d. er 75.000 kr. og 150.000 kr., er bert 1.088 kr. um árið, tá lánið er 100.000 kr., og um skattskylduga inntøkan er 100.000 kr. og 200.000 kr. 1.248 kr., tá lánið er 100.000 kr. Orsakað av hesum verður skotið upp at broyta afturgjaldingartíðina.

1. viðgerð 29. mars. Málið varð heint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 29. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Anfinn Kallsberg, Øssur Dam Jacobsen, Hilmar Kass og Adolf V. Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ove Mikkelsen og Jørgen Thomsen) førir fram: Tær broytingar, sum landsstýrið hevur skotið upp at gera í lógini fyri Húsalánsgrunnin, merkja í roynd og veru, at tey endamál, ið løgtingið setti sær á hesum øki í 1978, verða sópað burtur. Lóggávan frá 1978 hevði hesi bæði grundsjónarmið:

1) Grunnurin skuldi fyrst og fremst veita lán til sethús í vanligari stødd, ikki til risastórar borgir.

2) Afturgjaldstíðin skuldi laga seg eftir inntøkuni hjá lántakarunum, so at tey, ið hava lága inntøku, skuldu fáa longri lánitíð enn tey, sum hava góða inntøku.

Bæði hesi endamál verða strokin, verður landsstýrisuppskotið samtykt.

Eftir galdandi reglun kunnu veitast upp til 90% av metingarvirðinum í láni, um húsini ikki eru størri enn 120 m², annars bert 40%. Av tí at grunnurin ikki hevur havt nóg nógvan pening tøkan, hevur hetta í praksis virkað soleiðis, at hús upp til 120 m² hava fingið 100.000 kr. í láni, hini 60.000 kr.

Landsstýrið skjýtur nú upp at broyta lóg og reglugerð soleiðis, at hús millum 120 og 135 m² kunnu fáa 75% í láni og millum 135 og 150 m² 45% í láni. Samstundis verður útrokningin av gólvviddini broytt soleiðis, at tey flestu í framtíðini uttan iva fara at byggja hús í støddini upp til 135 m², t.v.s. at í komandi árum fara húsastøddirnar aftur at vaksa. Ætlan landsstýrissins er at veita 100.000 kr. í láni í fyrsta umfari til hús í hesi støddini.

Tey smæstu húsini — upp til 120 m² — skulu eftir ætlanini fáa 120.000 kr. í láni. Tann broytta uppmátingin ger, at gólvviddin í hesum húsum verður nógv minni enn nú, av tí at alt verður tikið við, t.d. trappuuppgongd og — um tað er í stovuhæddini — vaskirúm, durur, hjallur, bilhús o.a. Henda broyting fer helst sum nevnt at hava við sær, at tey flestu fara at byggja hús í støddini upp til 135 m².

Landsstýrið ætlar eisini, at hús, sum ongan kjallara hava, kunnu víðka stovuhæddina við 20%, uttan at hetta broytir lánsupphæddina. Hetta merkir, at eini hús, 135 m² til støddar, kunnu víðkast við 27 m² í stovuhæddini til 162 m². Tað er ongin, sum sigur, at allir hesir 27 m² verða nýttir til t.d. hitarúm og vaskirúm.

Ein onnur broyting, sum ætlanin er at gera, er, at bert 75% av gólvviddini á loftinum skal teljast við. Um eini hús hava stovu- og loftshædd, sum eru 62 m² hvør, so telja teir ovaru 62 m² ikki meira enn 46,50 m², t.v.s. at her eru 13,50 m² tøkir, sum húsini kunnu viðkast við, t.d. við einum útbygningi — og kortini verða tey innan fyri 135 m² markið.

Alt hetta, sum her er nevnt, vísir, at húsini fara — við almennum rentustudningi — at gerast munandi størri tey komandi árini. Tann álvarsligasta broytingin er tó eftir: í framtíðini skal kjallari ongantíð roknast upp í innrættaða gólvvídd. Íbúðamálið er uttan iva at fáa gongd á aftur spekulasjónina í at leiga kjallaran út, so at summi, sum byggja, kunnu fáa onnur, ið ikki hava ráð at byggja, at gjalda meginpartin av rentunum og avdráttum fyri seg.

Sagt verður í viðmerkingunum til landsstýrisuppskotið, at fyri at fáa 100.000 kr. í láni, mugu húsini ikki vera størri enn 135 m². Í veruleikanum fer myndin at siggja soleiðis út: Eini hús verða bygd í tveimum hæddum umframt kjallara, 62 m² hvør hæddin. Av ti at bert 75% av loftinum verða tald við, kunnu húsini vaksast við 13,50 m² til 147,50 m². Haraftrat er loyvt at rætta kjallaran inn, antin til egna nýtslu ella til útleiging. Tá hitarúm og vaskirúm eru drigin frá, kunnu t.d. 40 m² innrættast. Innrættað gólvvídd í húsunum verður nú 187,50 m².

Eftir uppskoti landsstýrisins verða sostatt í framtíðini veittar 100.000 kr. í láni til eini hús, sum hava 187,5 m² av innrættaðari gólvvídd, meðan mesta stødd í dag er 120 m² fyri hesar somu 100.000 kr.

Landsstýrið skjýtur upp, at onki lán skal veitast til bygging av húsum, sum eru 150 m² og størri. Hesum kann minnilutin taka undir við.

Eftir uppskotinum skal afturgjaldstíðin ikki sum nú laga seg eftir inntøkuni hjá lántakaranum, men skal vera 28 ár fyri øll og skal umleggjast til annuitetslán. Ein av grundgevingunum fyri hesi broyting er, at munurin á avgjøldum er so lítil hjá teimum, sum hava høga inntøku, og teimum, sum hava lága.

Hesin munur veksur tó so hvørt, sum útlánsupphæddin hjá grunninum veksur. Sum er kann afturgjaldstíðin liggja millum 20 og 40 ár. Minnilutin mælir til, at lánstíðin skal liggja millum 10 og 40 ár. Eisini hetta hevði økt um munin á avgjøldum.

Sum nevnt í inngangínum tekur uppskot landsstýrisins øll tey prinsipp burtur, sum vórðu framd í 1978. Eisini tey vælløntu í samfelagnum skulu nú hava eina lánstíð uppá 28 ár — og tað enntá til at byggja risastór hús fyri.

Minnilutin setir fram hetta

BROYTINGARUPPSKOT

§ *1.* Í løgtingslog nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunn verða gjørdar hesar broytingar:

§ *1.* I lagtingslov nr. 97 af 1. november 1978 om boligfond foretages følgende ændringer:

1) Í § 8 verður skoytt upp í 1. stk.:
Hús og íbúðir størri enn 150 m² fáa onki lán úr Húsalánsgrunninum.
2) Í § 12 verða orðini »20 ár« broytt til »10 ár«.

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

1) I § 8 tilføjes til 1. stk.:
Boligfonden yder ikke lån til huse og lejligheder, der er større end 150 m².
2) I § 12 ændres ordene »20 år« til »10 år«.

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 23. apríl. Broyting frá minnilutanum (Ove Mikkelsen og Jørgen Thomsen) til § 1, pkt. 1 fall við 13-0, pkt. 2 við 13-0. Landsstýrisins uppskot § 1, pkt. 1 samtykt við 27-0, pkt. 2 niður til »hús og íbúðir« samtykt við 19-0, frá »hús og íbúðir« samtykt við 31-0, pkt. 3 og 4 samtykt við 19-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. apríl. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1426-5-1 Lóg nr. 65 frá 11. mai 1982.

---

149. Partapeningur í P/f Fisk, Hvalba.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgting og um partapening í P/F Fisk, Hvalba.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 20% av tí kravda partapeninginum í P/F Fisk, Hvalba, og at leggja út peningin úr landskassanum.

lagtingslov om aktier i P/F Fisk, Hvalba.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/F Fisk, Hvalba, med et beløb på indtil 20% af den forlangte aktiekapital og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2. Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2. Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skullu stille, er opfyldt.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/F Fisk, Hvalba, hevur ætlanir um at byggja eitt flakavirki og eina útróðrarmiðstøð í Hvalba. Kostnaðurin av hesum virki er mettur til 7 mió. kr.

Figgingin ætlast at verða:

Lán: P/F Føroya Banki ..... kr. 500.000,-
Kreditforeningen Danmark ..... kr. 1.000.000,-
Menningargrunnurin ..... kr. 1.800.000,-
Fiskaribankin ..... kr. 1.500.000,-

Studningur:

Studningur til útróðrarstøð ..... kr. 500.000,-
Studningur frá Menningargrunninum ..... kr. 200.000,-

Partapeningur ..... kr. 1.500.000,-,
herav landskassin 20% ella kr. 300.000,-.

Í januar 1980 søkti felagið um lán úr Egnudviklingsfonden til eitt projekt uppá kr. 18,2 mió., men sýtti Egnsudviklingsfonden fyri láni. Seinni varð projektið broytt til at kosta 6-7 mió. kr.

Landsstýrið metir, at her er talan um at skaffa arbeiðspláss til eina størri bygd, har neyðug arbeiðsmegi er til staðar. Eisini eru stórar iløgur í havnabygging gjørdar.

Eisini kemur tað inn í bílætið, at tá gongd kemur á framleiðsluna av svartkjafti til matna, kemur henda framleiðsla væntandi fyrst og fremst at fara fram í økinum Streymoyggin-Eysturoyggin-Klaksvík, soleiðis at flakaframleiðslan av vanligum fiskavørum meira ella minni verður flutt til onnur pláss, eitt nú Hvalba.

Roknað verður við, at virkið í fyrstani fær fisk frá 6 deksbátum og 25 opnum bátum, sum skuldu kunna avreitt um 2.000 tons. Eisini verður roknað við, at menn fara at útvega sær onnur skip, tá virkið er liðugt. Høvuðseigararnir í virkinum hava júst keypt ein 60 t. bát, og í umbúna er at keypa tveir aðrar størri bátar til bygdina.

Upplýst verður, at 1,2 mió. kr. í partapeningi longu er inngoldin.

1. viðgerð 29. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 29. mars beint í fíggjarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 16. apríl. §§ 1 og 2 samtyktar við 27-0, § 3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 19. apríl. Uppskotið varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1413-1-86. Lóg nr. 72 frá 21. mai 1982.

---

150. Broyting í lógini um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fornyelse af fiskerflåden.

§ *1.* Løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum verður broytt soleiðis:

1. § 2, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Stuðulslán til bygging av deksfiskifari ella opnum útróðrarbáti kann veitast við upp til 15% av virðinum við maskinu og øðrum tilhoyri, tá skipið er undir 120 føtur

§ *1.* Lagtingslov nr. 24 af 1. juni 1978 om fornyelse af fiskerflåden bliver ændret således:

1. § 2, stk. 1 får følgende formulering:

»Støttelån til bygning af dæksfiskerfartøj eller åben båd kan ydes med indtil 15% af værdien med maskine og andet tilbehør, hvis skibet er under 120 fod langt, og med ind-

langt, og við upp til 20%, tá skipið er yvir 120 føtur. Tá bygt verður deksfiskifar á føroyskari skipasmiðju, tó upp til 30%.»

2. Í § 4, 1. stk. verður »3%« broytt til »4%«,

Í § 6, 1. stk. verður »15%« broytt til »20%« og 2. stk. verður broytt til:

»Verður arbeiðið gjørt aðrastaðni enn í Føroyum, verður einki stuðulslán latið.«

4. Í § 9 verður »4%« broytt til »5%«.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Broytingar í hesi lóg ávirka ikki givnar tilsagnir um stuðulslán v.m. eftir higartil galdandi lóggávu. Hesar tilsagnir verða at viðgera í síni heild eftir tí lóggávu, ið galdandi var, tá tilsøgnin varð givin.

til 20%, hvis skibet er over 120 fod. Såfremt dæksfiskerfartøj bliver bygget på færøsk værft, dog op til 30%.«

2. I § 4, stk. 1 ændres »3%« til »4%«.

3. I § 6, stk. 1. ændres »15%« til »20%«, og stk. 2 ændres til:

»Udføres arbejdet andre steder end på Færøerne, ydes intet støttelån.«

4. I § 8 ændres »4%« til »5%«!

§ 2. Denne lov træder i kraft straks. Ændringerne i denne lov påvirker ikke givne tilsagn om tilskudslån m.v. efter den hidtil gældende lov. Disse tilsagn bliver at behandle i sin helhed i henhold til den lov, der var gældende, da tilsagnet blev givet.

Viðmerkingar:

Landsstýrið metir út fra fyribils áliti frá Fiskivinnuráðnum og fyriliggjandi upplýsingum annars, at okkara fiskifloti til veiðu eftir teimum higartil vanligu fiskasløgum er nóg stórur.

Hin vegin er sami fiskifloti í meðal so nikið gamal, at tað er neyðugt at fáa nýggj skip í flotan.

Hóast nógv eldri og gomul nýtilig skip eru á sølumarknaðinum, so metir landsstýrið tað vera skeivt at loyva innflutningi av ov nógvum gomlum skipum til vanliga veiðu.

Flestu av teimum skipum, vit skulu hava aftrat, eiga at vera bygd úr nýggjum.

Tá ið tað hevur stóran týdning fyri okkara egna arbeiðsmarknað, bæði uppá stytri og longri sikt, at flest møgulig skip verða bygd í Føroyum, mælir landsstýrið til at hækka stuðulslánið til skip, bygd í Føroyum, og samstundis at lækka stuðulslánini til skip, bygd uttanlands.

Tó er stuðulslánið til størri skip (yvir 120 fót) bygd uttanlands tað sama í uppskotinum, sum galdandi er í dag.

Eisini verður mælt til at hækka stuðulslán til umbyggingar í Føroyum, meðan umbyggingar gjørdar uttanlands ikki meira fáa stuðulslán.

At økja um skipabyggingina í Føroyum og at fremja fleiri umbyggingar av skip

um fyri Føroyar útvegar í fyrsta lagi fleiri arbeiðspláss heima á landi og fer í øðrum lagi at tryggja okkum útbúnar skipabyggimenn.

Eftir fyriliggjandi uppskoti verður eitt nýbygt ella eitt umbygt skip samanumtikið sum nógv betur figgjað, at mælt verður til at hækka renturnar av stuðulslánum frá 3-4%.

1. viðgerð 30. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 9. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 30. mars 1982 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. apríl 1982 og varð í nevndini semja um at taka undir við uppskoti landsstýrisins, tó at meirilutin (Ivan Johannesen, Juul Jacobsen, Ove Mikkelsen, Anfinn Kallsberg og Fredrik Olsen) var av teirri áskoðan, at reglan um veitan av stuðulsláni fyri umbyggingar í útlondum upp á 8% eigur at verða varðveitt, og mælir til, at lógin verður orðað soleiðis, at verður arbeiðið eftir avgerð frá landsstýri og figgjarnevnd gjørt í útlondum, verður stuðulslánið upp til 8%.

So statt setur meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 6, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Verður arbeiðið eftir avgerð frá landsstýri og figgjarnevnd gjørt aðrastaðni enn í Føroyum, verður stuðulslánið upp til 8%.«

§ 6, stk. 2 får følgende formulering:

»Udføres arbejdet efter beslutning af landsstyret og finansudvalget andre steder end på Færøerne, kan ydes tilskudslån på op til 8%«.

2. viðgerð 27. apríl. Broytingaruppskot frá meiriluta í figgjarnevndini til § 6 samtykt við 29-0. Landsstýrisins uppskot soleiðis broytt § 1 samtykt við 32-0 atkvøðum, og § 2 við 32-0 atkvøðum.

27. apríl legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Til meirlutans broytingaruppskot í álitinum verður sett fram hetta broytingaruppskot:

§ 6, 2. stk. verður orðað soleiðis:

»Verður arbeiðið eftir góðkenning frá landsstýri og fíggjarnevnd gjørt aðrastaðni enn í Føroyum, verður stuðulslánið upp til 8%.«

§ 6, stk. 2 formuleres som følger:

»Udføres arbejdet efter godkendelse fra landsstyret og finansudvalget andre steder end på Færøerne, kan ydes tilskudslån på op til 8%.«

Sama dag løgdu tingmenninir Adolf V. Hansen og Jørgen Thomsen fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 2, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Stuðulslán til bygging av deksfari ella opnum útróðrarbáti kann veitast við upp til 20% av virðinum við maskinum og øðrum tilhoyri. Tá bygt verður deksfiskifar á føroyskari skipasmiðju, tó upp til 30%.«

§ 2, stk. 1 formuleres som følger:

»Støttelån til bygning af dæksfiskerfartøj eller åben båd kan ydes med indtil 20% af værdien med maskiner og andet tilbehør. Såfremt dæksfiskerfartøj bygges på færøsk værft, dog op til 30%.«

3. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen og Jørgen Thomsen fall við 13-0, broytingaruppskot frá Adolf Hansen samtykt við 18-0. Uppskotið soleiðis sum samtykt við 2. viðgerð og broytt endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1415-2-8. Lóg nr. 62 frá 6. mai 1982.

151. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum frá Sverra Midjord, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Hvussu langt er landsstýrið komið við at fyrireika stovnsetingina av Landsbanka Føroya sambært løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978.

Viðmerkingar:

Í 1978 samtykti Føroya Løgting at stovuseta Landsbanka Føroya (løgtingsmál nr. 33/1978 og løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978).

Tá undanfarna landsstýrið legði frá sær, var arbeiðið við at fáa landsbankan at virka komið so mikið áleiðis, at umboðsráðið var valt.

Í løgtingsmáli nr. 110/1981: Fyrispurningur frá Tórolvi Mohr Olsen og Hans Marius Jocnsen til Páll Vang, landsstýrismann viðvíkjandi nýggjari royndarstøð og landbúnaðarskúla svarar landsstýrismaðurin soleiðis:

»Tað er eisini ein rættur og ein skylda hjá landsstýrinum at virka eftir teimum lógum, tingið hevur viðtikið.« Og síðani sigur landsstýrismaðurin: »Sum áður sagt, so er tað neyðugt at fylgja galdandi løgtingslóg og galdandi landsstýrisviðtøku....«.

Vísandi til hetta, má roknast við, at landsstýrið eisini metir tað sum eina skyldu, at arbeiða fyri, at Landsbanki Føroya fer at virka, og loyvi eg mær tí at seta fram frammanfyri standandi fyrispurning.

30. mars svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 151/1981 hevur Sverri Midjord, løgtingsmaður, 17. mars 1982 sett mær henda fyrispurning:

»Hvussu langt er landsstýrið komið við at fyrireika stovnsetingina av Landsbanka Føroya sambært løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978.«

Uppskot um stovnseting av landsbanka í Føroyum varð á fyrsta sinni lagt fram á ting av Poul J. Olsen, løgtingsmanni í 1969. Uppskotið fall.

Í 1972 legði Tjóðveldisflokkurin lógaruppskot á ting um stovnseting av føroyskum landsbanka. Hetta mál fall eisini.

Lógin um Landsbanka Føroya varð samtykt við teprum meiriluta á tingi í 1978.

Tann samgongan, ið framdi lógina um landsbankan, varð sitandi tvey ár eftir samtykt lógarinnar. Í hesum tíðarbili er lýst kunngerð frá 23. juni 1979, sum broytt við kunngerð frá 7. august 1979 um val av limum í umsjónarráð Landsbanka Føroya. Tikin eru stig til at velja umsjónarráðið sambært lóg og reglugerð, men ráðið sæst ikki vera vorðið fullmannað. Longur er ikki komið við at fyrireika stovnsetingina av Landsbanka Føroya.

Við valið í 1980 kom ein samgonga í lag, sum fyri ein stóran part var ímóti lógini um føroyskan landsbanka, og síðani landsstýrisskiftið hevur ikki verið gjørt meiri við fyrireikingararbeiðið.

Samgonguskjalið hjá sitandi samgongu sigur einki um landsbanka, og tað er illa hugsandi, at víðari fyrireikingar verða gjørdar at stovnseta føroyskan landsbanka sambært løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978, løgtingslóg um Landsbanka Føroya, so leingi henda samgonga situr.

F.L.j.nr. 1400-9-1

---

151. Fyrispurningar til Olaf Olsen, landsstýrismann

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at Olaf Olsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum frá Jørgen Thomsen, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Ætlar landsstýrið at geva pf. á Bakka í Lorvík innflutningsloyvi til ein nýggjan feskfiskatrolara?

Um svarið er játtandi, nær kann felagið so rokna við at hetta loyvi verður givið?

Viðmerkingar:

Fyri umleið einum ári síðani søkti pf. á Bakka í Lorvík um innflutningsloyvi til ein nýggjan feskfiskatrolara.

Felagið á Bakka, sum eigur m/t »Bakka Kristian«, hevur nú bíðað eftir svari í meira enn eitt ár, og má tað tí metast at vera rímuligt, at landsstýrið nú gevur hetta innflutningsloyvi.

Sum kunnugt hevur m/t »Bakka Kristian« havt ómetaliga stóran týdning fyri flakavirkið Frost í Lorvík og hevur trolarin givið rættuliga nógv arbeiði til fólkið í bygdini.

Av tí, at flakavirkinum í Lorvík tørvar ávøru, er arbeiði á virkinum ikki samanhangandi í tann mun tað kundi verið, og kundi ein festfiskatrolari nakað størri enn »Bakka Kristian« bøtt munandi um hetta.

Av tí, at p.f. á Bakka nú ótolnast eftir svari, loyvi eg mær hervið at seta frammanfyristandandi fyrispurning.

29. mars svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

uppá

fyrispurning til Olaf Olsen, landsstýrismann, frá Jørgen Thomsen, løgtingsmanni. Í fyrispurninginum verður spurt, um landsstýrið ætlar at geva p/f Á Bakka í Lorvik innflutningsloyvi til nýggjan trolara, og um so er, nær loyvið verður givið.

Viðvikjandi innflutningsloyvum til fiskiskip kann støðan býtast sundur í trý.

1. Skip til nýggja vinnu.
2. Skip til útskifting av øðrum (eldri) skipi.
3. Skip at seta inn í verandi traditionellan fiskiskap.

ad. 1. Skip til nýggja vinnu hevur tingið fingið frá landsstýrinum skriv, sum sýnir, at landsstýrið viðmælir, at farið verður undir at útvega nýggj skip til slika veiðu.

ad. 2. Skip til útskifting av (eldri) skipi havi eg fyri stuttum svarað øðrum tingmanni uppá.

ad. 3. Skip til at seta inn í verandi traditionellan fiskiskap hevur landsstýrið higartil hildið aftur við at geva innflutningsloyvi, tí ivi hevur verið, um tað er forsvarligt at økja veiðutrýstið uttan at skaða fiskastovnarnar.

Landsstýrið væntar sær í apríl mánaði tilráðing hesum viðvikjandi, og skjótt aftaná verða tær umsóknir, sum liggja, viðgjørdar í landsstýrinum.

Viðmerkjast kann, at tann, sum vil byggja skip í Føroyum, ikki nýtist innflutningsloyvi.

F.L.j.nr. 1608-415

153. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann

Ár 1982, friggjadagin 19. mars varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum frá Sverra Midjord, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Nær ætlar landsstýrið at geva ÍSF loyvi til at fyriskipa danska tipping í Føroyum?

Viðmerkingar:

ÍSF hevur havt samráðingar við landsstýrið um at fáa loyvi til at fyriskipa danska tipping í Føroyum. Í løtuni verður tippað fyri umleið 10.000 kr. um vikuna og nú luttaka einans nøkur einstøk fólk.

Mett verður, at ein reglulig og fyriskipað tipping í Føroyum vildi givið ÍSF so munandi av peningi, at felagsskapurin møguliga ikki í framtíðini kemur at hava almennan stuðul fyri neyðini.

Eisini kann verða nevnt, at partur av vinninginum hjá donsku tipstænastuni verður tillutaður ymiskum ungdóms- og fritíðaraktivum her í Føroyum, og tí vildi tað ikki verið meira enn rímuligt, um vit høvdu eina regluliga og væl fyriskipaða tipping her heima.

Virksemið hjá ÍSF er munandi økt hesi seinastu árini. M.a. kann verða nevnt, at føroyingar nú skulu luttaka í VM í svimjing, at vit í størri og størri mun luttaka í millumlanda- og altjóða ítróttarkappingum, og at føroyingar nú skulu seta eina olympiska nevnd, við tí endamáli at fyrireika føroyska luttøku í komandi olympisku leikunum.

Hetta kann virka ógvusligt og óneyðugt, heldur onkur, men tað, at vit luttaka í millumlanda- og altjóða ítróttarkappingum, og at føroyska flaggið verður vundið á stong í hesum sambandi, er í sjálvum sær eitt reklama fyri Føroyar og føroyskan útflutning.

Aðalmálið við ítróttinum er ikki at verða nr. 1, men at luttaka, og tí er tað rætt og rímuligt, at ítróttirin er við til at figgja sítt egna virksemi.

30. mars svaraði Tórbjørn Poulsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 153/1981 hevur Sverri Midjord, løgtingsmaður 18. mars 1982

sett mær henda spurning:

»Nær ætlar landsstýrið at geva ÍSF loyvi til at fyriskipa danska tipping í Føroyum?«

Spurningurin um at skipa fyri danskari tipping í Føroyum so at skilja, at Føroyar gerast partur av donsku tipstænastuni javnbjóðis við Danmark og Grønland og við autoriseraðum sølustøðum, er ikki nýggjur.

Málið sæst at hava verið kannað í 1974 av tásitandi landsstýri. Mett varð, at tann føroyski parturin av teirri samlaðu donsku tippingini kundi verið millum 1 og 1 1/2%.

Um so er, at hesi tøl eru alsamt galdandi, so kundi sambært roknskapartøl frá Dansk Tipstjeneste fyri 1980/81 fallið til føroysk ítróttarfeløg u. 2 mió. kr. í ár. Harumframt kemur ágóði seljaranna, sum er 10% av søluni.

Málið danskari tipping í Føroyum viðvikjandi hevur ligið á láti síðani, og tað er ikki likt til, at tað vinnur frama av sitandi landsstýri heldur.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at tað skal lógarbroyting til av donsku tipslógini, um Føroyar skulu tryggja sær rætt til ávikavist sín lutfalsligan part í avgjaldinum til statin (19%) og tí sum tillutað verður til ítróttarendamál.

Hóast Føroyar ikki officielt taka lut í donsku tippingini, so eru vit ikki heilt við skerdan lut. Av tí partinum av avlopinum, sum avsettur er til vælgerandi og almennnyttug endamál og sum figgjarmálaráðið ræður yvir, vórðu í 1980 tilsamans tillutaðar feløgum og stovnum í Føroyum u. 120.000 kr.

Eftir avtalu við ÍSF kannar landsstýrið møguleikarnar fyri at skipa fyri einari føroyskari tipstænastu.

F.L.j.nr. 528-1.

---

154. Broyting í løgtingslóg um sjómansskúla og sjómanslæru.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýri fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í lógtingslóg um sjómannaskúla og sjómannalæru.

§ *1.* Í løgtingslóg nr. 8 frá 19.mars 1954 um sjómannaskúla og sjómannalæru við seinni broytingum verður sum nýggj § 7 sett:

»Til heimaskiparaprógv og skiparaprógv verður lært og fer prógvtøka fram eftir reglum, sum landsstýrið fyrisetir í kunngerð.«

§2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om søfartsskole og navigationsundervisning.

§ *1.* I lagtingslov nr. 8 af 19. marts 1954 om søfartsskole og navigationsundervisning med senere ændringer indsættes som ny § 7:

»Til kystskipper- og skippereksamen undervises og eksamineres efter de nærmere regler, som landsstyret fastsætter i bekendtgørelse.«

§ *2.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsskúlafyrisitingin hevur sett eina nevnd at gera uppskot til broytingar í innihaldinum í útbúgvingini og prógvtøkuni hjá skiparum og heimaskiparum umframt at koma við uppskoti til tær broytingar í rættindum, manningalóg v.m., sum møgulipt her av standast.

Grundin til, at nevndin var sett, var tann, at teir, sum eru kønir á hesum øki, leingi hava gjørt vart við, at læran í sínum núverandi líki setir ov smá krøv og er ótíðarhóskandi.

Læran til heimaskipara fer fram eftir kunngerð nr. 46 frá 11. september 1958 við seinni smábroytingum, og til skipara fer prógvtøkan fram eftir kunngerð nr. 65 frá 18. november 1968, sum eru sendar út við heimild í § 7, í lóg nr. 8 frá 19. mars 1954 um sjómannaskúla og sjómannalæru.

Nevndin hevur viðgjørt uppskot um, at reglurnar um læru- og prógvtøku til heimaskipara eiga at broytast. Heimaskiparaprógv gevur eftir manningarlógini t.d. rættindi - at føra fiskiskip upp til 500 brt. á heimaleið (100 førðingar úr Føroyum) og tekur læran 2 mánaðir ella ein vetur á kvøldskúla, og verður tí mett, at teoretiska útbúgvingin hjá heimaskiparum setir ov smá krøv og er ótíðarhóskandi. Haraftrat eru vit heilt afturútsilgd á hesum øki í mun til hini norðurlondini.

Nevndin hevur gjørt uppskot til nýggja kunngerð um heimaskipara- og skiparalæru, sum áskoðar, at skeið til heimaskiparar verður munandi meira umfatandi

og kemur at taka 5 mánaðir. Innihaldið í skiparalæruni er ikki so nógv broytt í uppskotinum, men skal tann, sum fer á skiparaskeið — 5 mánaðir — fyrst hava tikið heimaskiparaprógv, samlaða tíðin verður soleiðis 10 mánaðir, sum er tað sama sum eftir núgaldandi regluni.

Eftir lógini er lesitíðin nú umleið 36 vikur til skiparaprógv og 6 vikur til heimaskiparaprógv.

Mett verður, at hetta uppskotið ber í sær, at § 7 í omanfyri nevndu lóg má broytast eitt sindur, tí at tað stendur í lógini, hvørjar lærugreinirnar til heimaskipara og skipara eru, og hvussu langa tíð skeiðini taka.

Lógarbroytingin ger onga broyting í núverandi kunngerðum, men gevur hon landsstýrinum heimildina at áseta innihaldið o.s.fr., og fer at vera arbeitt fram í móti at fáa ta nýggju kunngerðina í gildi, áðrenn næsta skeið byrjar á Sjómansskúlanum, og tí má lógin broytast nú. Landsskúlafyrisitingin metir eisini, at tað er betri, at slíkt verður ásett í kunngerð. Tað ger tað lættari at ájourføra innihaldið; hetta er galdandi fyri læruna til stýrimenn og skipsførara. Føroyska lógin vísir til donsku reglurnar hesum viðvíkjandi í § 8, 2. stk., og verður innihaldið í donsku læruni alsamt broytt í kunngerð, rundskrivum etc.

1. viðgerð 30 mars. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1982 og við 1. viðgerð 30. mars beint í skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Óli Breckmann, Ivan Johannesen og Gurtorm Klein) mælir til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard og Finnbogi Isaksen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, um landsstýrið kann veita trygd fyri, at tað framvegis verður møguligt at taka heimaskiparaskeið úti um landið.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið § 1 samtykt við 18-0, § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 28. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1629-1-2. Lóg nr. 58 frá 6. mai 1982.

155. Broyting í løgtingslóg um ráfiskagrunn.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði Jørgen Thomsen, løgtingsmaður vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at seta nevnd við umboðum fyri Meginfelag útróðramanna, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag við tí endamáli at endurskoða lógina um ráfiskagrunnin serliga við tí fyri eyga at gera studningsveitingarnar einfaldari og at flyta ráfiskagrunnin yvir í søluliðið.

Viðmerkingar:

Sjey ár eru nú liðin síðani ráfiskagrunnurin fór at virka. Við løgtingslóg varð grunnurin skipaður í 1975.

Sum kunnugt ásetir nevndin fyri ráfiskagrunnin avreiðingarprísirnar fyri ávis tíðarskeið. Munurin ímillum avreiðingarprísin og avrokningarprísin verður síðani útliknaður millum grunnin og fiskakeypararnar.

Tá samráðingar í sini tíð vóru um skipan av ráfiskagrunninum, vóru flokkarnir ójavnir á máli um, hvar grunnurin skuldi liggja. Stríðið stóð um, annaðhvørt grunnurin skuldi liggja í virkisliðnum ella í søluliðnum, men tá fekst politiskur meiriluti ikki fyri at leggja grunnin í søluliðið við tí úrsliti, at grunnurin varð lagdur í virkisliðið.

Javnaðarflokkurin metti og metir framvegis, at tað hevði verið rættari, um ráfiskagrunnurin varð lagdur í søluliðið, tá hetta fyri tað fyrsta vildi gjørt studningsveitingarnar einfaldari og fyri tað næsta vildi tryggjað vinnuni og tí almenna størri innlit í fiskasølumál.

Sum nevnt, var tað ikki møguligt í síni tíð at fáa politiskan meiriluta fyri at leggja ráfiskagrunnin í søluliðið, men í samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýrissamgongu verður m.a. sagt um hesi viðurskiftir:

»Studningsskipanin til fiskivinnuna og lógin um ráfiskagrunnin skulu endurskoðast og gerast einfaldari. Sum lið í hesum verður umhugsað, um stuðulin kann leggjast í annað lið enn í verandi skipan.«

Hetta metir javnaðarflokkurin sum eina ábending um, at møguleikarnir fyri at flyta ráfiskagrunnin yvir í søluliðið, nú kunnu vera til staðar. Javnaðarflokkurin mælir tí til at seta nevnd at endurskoða lógina um ráfiskagrunnin nú.

1. viðgerð 30. mars. Málið varð beint í fiskivinnumevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð framlagt av Javnaðarflokkinum og við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Frederik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Jógvan I. Olsen) førir fram, at landsstýrið arbeiðir við hesum málsøki út frá málssetningunum í samgonguskjalinum sum m.a. sigur, at studningsskipanin til fiskivinnuna og lógin um ráfiskagrunnin skulu endurskoðast og gerast einfaldari. Sum lið í hesum verður umhugsað, um stuðulin kann leggjast í annað lið enn við verandi skipan, og metir meirilutin tað sostatt vera óneyðugt, at løgtingið áleggur landsstýrinum at seta eina serstaka nevnd at endurskoða hesa lóggávu, og setir meirilutin tí einki uppskot fram.

Minnilutin (Tórálvur Mohr Olsen og Jutul Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Hans Marius Joensen) tekur undir við fyriliggjandi uppskot, men loyvir sær kortini at seta nakrar viðmerkingar fram til fyriliggjandi uppskot. Tá talan í fyrsta sinni var um ráfiskagrunn, legði Petur Reinert, fyrrverandi landsstýrismaður, fyri tjóðveldisflokkin tann 14. apríl 1975 fram fyri táverandi landsstýrið fullfíggjað uppskot til ráfiskagrunn, og gekk hetta uppskot út upp á, at grunnurin varð lagdur í søluliðið, og somuleiðis at allir fiskaprísir vóru pristalsviðgjørdir, hetta uppskotið fekk ikki meiriluta í tásitandi landsstýri, men var lagt fram sum eitt kompromis í broyttum líki tann 23. apríl 1975, men fíggjarnevndarviðgerðin broytti 30. apríl sama ár uppskotið til, at grunnurin skuldi virka í virkisliðinum. Hetta varð samtykt 5. mai 1975.

Undir viðgerðini av stuðulsskipanini til fiskivinnuna tann 30. mars 1981 legði Tjóðveldisflokkurin fyri tingið sítt upprunauppskot um ráfiskagrunn, men vann tað heldur ikki frama á hesum sinni.

Tá nú uppskotið aftur er lagt fyri tingið av løgtingsmanninum Jørgen Thomsen úr Javnaðarflokkinum um broytingar í løgtingslóg um ráfiskagrunn, sum hevur til endamáls at leggja ráfiskagrunnin í søluliðið, er tað tí sjálvsagt, sum áður nevnt, at minnilutin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti.

2. viðgerð 28. apríl. Uppskotið fall við 14-0 atkvøðum.

156. Uppskot til løgtingslóg um útflutningsbann av ótilvirkaðum fiski.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður vegna Tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um útflutningsbann av ótilvirkaðum fiski.

lagtingslov om udførselsforbud af utilvirket fisk.

§ *1.* Bannað er at útflyta óviðgjørdan fisk, sum er avreiddur í Føroyum og kann viðgerast í Føroyum.

§ *1.* Det er forbudt at udføre utilvirket fisk, der er indhandlet på Færøerne og som kan tilvirkes på Færøerne.

§ *2.* Landsstýrið kann í einstøkum førum og undir serstøkum umstøðum veita undantaksloyvi frá hesum útflutningsbanni.

§ *2.* Landsstyret kan i enkelte tilfælde og under særlige omstændigheder gøre undtagelse fra dette udførselsforbud.

§ *3.* Munurin á avreiðingar- og avrokningarprísi kann ikki latast fyri slíkan fisk, sum fær undantaksloyvi eftir § 2.

§ *3.* Forskellen mellem indhandlings- og afregningspris kan ikke gives for den slags fisk, som får undtagelsestilladelse efter § 2.

§ *4.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ *4.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg nr. 15 frá 15. september 1948 setir bann fyri útflutningi av feskum fiski og í hvørjum einstøkum føri skal útflutningsloyvi gevast eisini fyri tilvirkaðan fisk.

Orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin kortini leggur hetta uppskot fram nú er tann, at broytingar eru hendar í studningslóggávuni síðani henda lóg frá 1948 kom í gildi soleiðis, at nú er fyrikomið fleiri ferðir, at fiskur verður fluttur at kalla ótilvirkaður av landinum, og at hesin fiskur samstundis hevur fingið studning frá Ráfiskagrunninum.

Hetta snýr seg í mesta lagi um kongafisk, brosmu og flatfisk. Umframt tað, at tey

virki, sum hava keypt henda fisk, og sent hann ótilvirkaðan av landinum at kalla, hava havt beinleiðis ágóða av hesum, hava tey harumframt fingið stuðul frá ti almenna gjøgnum ráfiskagrunnin, ein stuðul sum ikki var ætlaður til so lítið viðgjørdan fisk.

Harumframt ger hetta, at miltiónu upphæddir ikki koma til útgjaldingar í arbeiðsløn á landi.

Hetta má haldast vera burturvið, tá ið vit umhugsa tað arbeiðsloysi í Føroyum, sum alsamt vindur meira uppá seg. Vit hava hoyrt, at føroyskur fiskur fyri stóran part skal gerast grundarlagið undir fiskavirking í øðrum londum, eitt nú Hirtshals og í Grimsby, og meta vit at rættari var, at tann vinningur, sum arbeiðarastættirnir í Føroyum kundi havt av hesum arbeiði, varð liggjandi í Føroyum.

Eisini mugu vit rokna við, at partur av ti fiski, sum ótilvirkaður verður latin av landinum, kemur undan aftur kavi, viðgjørdur í øðrum londum, stuðlaður frá ti almenna har, í kapping við okkara egnu útflutningsvøru á ti fría marknaðinum.

Henda skeiva mannagongd vil við øðrum orðum føra við sær, at skattgjaldarans peningur gjøgnum ráfiskagrunnin verður nýttur til

1. at skapa enn størri arbeiðsloysi her á landi,
2. at føroyskur skattapeningur verður óbeinleiðis sendur uttanlands at skapa útlendsk arbeiðspláss fyri, hóast stórur tørvur er á teimum í Føroyum,
3. at almennur føroyskur peningur verður latin okkara útlendsku konkurrentum á heimsmarknaðinum, soleiðis at teir verða førir fyri at framleiða somu fiskavørur bíligari enn vit sjálvir, og harvið trýsta útflutningspris okkara munandi niður.

Tað eru enn fiskasløg, so sum kalvi, síl og laksur, sum vit enn ikki eru før fyri at virka nakað munandi áfeiðis her á landi, og metir flokkurin ti, at neyðugt er við ávisum undantaksloyvi frá banni av útflutningi av ótilvirkaðum fiski sum er avreiddur í Føroyum.

1. viðgerð 30. mars. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fram av Tjóðveldisflokkinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 30. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Meirilutin (Frederik Olsen, Øssur Dam Jacobsen, Anfinn Kallsberg, Tórálvur Mohr Olsen, Jógvan Olsen og Jutut Jacobsen) førir fram, at eftir lóg nr. 15 frá 15. september 1948 er ikki loyvt at útflyta fisk uttan landsstýrisins loyvi, og landsstýrið kann til eina og hvørja tíð nokta útflutningi av óviðgjørdum fiski. Meirilutin metir ti, at lóggávan á hesum øki er í lagi, og setir ti einki uppskot fram.

Minnilutin (Hans M. Joensen) tekur undir við uppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

2. viðgerð 23. apríl. § 1 fall við 6-0 atkvøðum.

F.T.,j.nr. 1516-55.

---

157. Partapeningur í P/f Vestmanna skipasmiðju.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um partapening í Pf. Vestmanna Skipasmiðju.

§ *1.* Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta kr. 180.000 av tí kravda partapeninginum í Pf. Vestmanna Skipasmiðju, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ *2.* Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ *3.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om aktier i Pf. Vestmanna Skipasmiðja.

§ *1.* Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i Pf. Vestmanna Skipasmiðja med et beløb på kr. 180.000,- af den udkrævede aktiekapital, og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ *2.* Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle udkræve, er opfyldte.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar.

Nevndin í P/f Vestmanna Skipasmiðju hevur í skrivi frá 23. december 1981 heitt á

Føroya Landsstýri um at seta partaening í P/F Vestmanna Skipasmiðju. Tá felagið varð stovnað í 1973 og keypti Vestmanna Skipasmiðju, var hetta eitt niðurslitið virki, og var frá byrjan ætlað at endurnýggja virkið; men av tí at long tíð gekk, áðrenn myndugleikarnir góðkendu byggiætlanina, so varð ikki byrjað at byggja fyrr enn í 1978, og er byggingin nú liðug.

Í viðtøkum felagsins varð upprunaliga loftið til partapening sett til 1 millión krónur, og er teknað fram til dagin í dag 720.000 kr. Nevndin var upprunaliga ein trímannanevnd, men á síðsta ársaðalfundi varð hon víðkað til fimmannanevnd.

Teknað er privat, hjá kommunu og hjá løngjaldstovu tað sum er møguligt og er heitt á landsstýrið um at seta 20% av samlaða partapeninginum á 900.000 kr., t.v.s. 180.000 kr. Landsstýrið fær tilsvarandi nevndarsess.

1. viðgerð 30. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 30. í s.m. beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen, Anfinn Kallsberg og Øssur Dam Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ivan Johannesen, Hilmar Kass og Adolf Hansen) eru av teirri áskoðan, at áðrenn landskassin setir partapening í felagið, eiga hesi at verða boðin út til almenna sølu, um so er, at einki er selt, tá kann heimild útvegast til at seta partapening í P/F Vestmanna Skipasmiðju. Sostatt setir nevndi minniluti fram soljóðandi

broytingaruppskot

§ 1 verður orðað soleiðis:

»Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at tekna kr. 180.000 av tí kravda partapeninginum í P/f Vestmanna Skipasmiðju og at leggja út peningin úr landskassanum, tó treytað av at eingin hevur boðið sær at keypa partabrøvini ella partar av teimum, eftir at hesi aftan á útboð ikki eru seld.«

§ 1 formuleres som følger:

»Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/f Vestmanna Skipasmiðja med et beløb på kr. 180.000 af den udkrævede aktiekapital og at disponere over beløbet af landskassens midler, dog betinget af at ingen har tilbudt at købe aktierne eller dele af disse, efter at de offentligt er udbudt til salg, ikke er blevet solgt.«

2. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskot frá minniluta í nevndini fall við 13-0. Landsstýrisins uppskot § 1 samtykt við 28-0, § 2 samtykt við 27-0, § 3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 23. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1427-1-99. Lóg nr. 56 frá 6. mai 1982.

---

158. Broyting í stuðulslánunum til útróðrarstøðir.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studningslán til útróðrarstøðir.

§ *1.* Í § 1, 1. stk. í løgtingslóg nr. 77 frá 24. oktober 1978 um studningslán til útróðrarstøðir verður sum nýtt seinasta punktum sett:

»Fyri hvønn bátin út yvir teir fyrstu 5, ið eru við í støðini, verður hámarkið hækkað við 50.000 kr.«

§ *2.* Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om tilskudslån til landingsanlæg for hjemmefiskeri.

§ *1.* I § 1, stk. 1 i lagtingslov nr. 77 af 24. oktober 1978 om tilskudslån til landingsanlæg for hjemmefiskeri indsættes som nyt sidste punktum:

»For hver båd udover de første 5, der er deltagere i anlægget, forhøjes overgrænsen med 50.000 kr.«

§ *5.* Denne lovtræder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í galdandi lóg frá 24. februar 1978 er mesti studningurin til eina útróðrarstøð

settur til kr. 500.000. Ætlanin við lógini var m.a., at eitt samtak millum nakrar fáar bátar til slíka íløgu sum eina útróðrarstøð skuldi stuðlast, og ætlað var, at kostnaðurin fyri umrøddu íløgu í meðal lá um kr. 300.000 fyri hvønn bátin, soleiðis at stuðulin togaði upp ímóti kr. 100.000 fyri hvønn.

Tá talið á útróðrarbátum er stórt á einum plássi, gevur lógin ikki møguleikar fyri at røkka sitt endamál vegna avmarkingina upp á kr. 500.000 til hvørja útróðrarstøð.

Mælt verður tí til eitt uppiskoyti til lógina.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 30. mars beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Ivan Johannesen, Jørgen Thomsen, Adolf Hansen, Ove Mikkelsen og Øssur Dam Jacobsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Hilmar Kass) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) er av teirri áskoðan, at hámarkið eigur at verða hækkað við 70.000 kr. í staðin fyri 50.000 kr., tá síðst nevnda upphædd ikki nøktar tørvin og diskriminerar tey pláss, har stórur útróðrarfloti er. Annars tekur nevndi minniluti undir við uppskoti landsstýrisins. So statt setur minnilutin (Anfinn Kallsberg) fram soljóðandi

broytingaruppskot
til
uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður í staðin fyri »50.000 kr.« sett »70.000 kr.«.	I § 1 indsættes i stedet for »50.000 kr.« »70.000 kr«.

2. viðgerð 24. apríl. Broytingaruppskot frá figgjarnevndini samtykt við 19-0. Uppskot landsstýrisins § 1 samtykt við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu.

27. apríl legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1 verður í staðin fyri »50.000 kr.«	I § 1 indsættes i stedet for »50.000

sett »kr. 70.000, tó kr. 90.000,-, um báturin er omanfyri 19 brt.«

kr.« »kr. 70.000, dog 90.000 kr., når båden overstiger 19 brt.«

3. viðgerð 28. apríl. Broytingaruppskot frá Adolf Hansen fall við 12-0 atkvøðum. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1413-7-1. Lóg nr. 60 frá 6. mai 1982.

---

159. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð við 29-0 atkvøðum samtykt, at Páll Vang, landsstýrismaður skuldi svara fyrispurninginum frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Nær fer landssjúkrahúsið undir at veita fólki við serligum tannarøktartørvi regluliga og skipaða tannarøkt og tannaviðgerð, so sleppast kann undan tí ótolandi støðu, sum hesi fólk eru í, tá talan er um tannlæknaviðgerð og tannarøkt?

Viðmerkingar:

Í fleiri ár hava nú høli ætlað til tannarøkt og tannlæknaviðgerð staðið tøk á landssjúkrahúsinum.

Ætlanin hjá avvarðandi myndugleikum og stovnum hevur verið at veita tannarøkt og tannlæknaviðgerð til sjúklingar og til tey, sum hava serligan tannarøktar- og tannlæknatørv.

Henda røkt hevur nú í fleiri ár verið veitt í øðrum hølum á landssjúkrahúsinum sum eitt slag av bráðfeingis neyðhjálp til tey mongu, sum av ymiskum orsøkum ikki kunnu ganga til teir vanligu tannlæknarnar.

Henda tannarøkt og tannlæknaviðgerð fer í dag fram undir umstøðum, sum vit ikki kunnu loyva okkum at bjóða teimum, sum av nevndu orsøkum eru noydd at brúka hana, ei heldur kunnu vit bjóða starvsfólkunum hesar arbeiðsumstøður.

Tað er ikki ov nógv avgjørt, tá sagt verður, at støðan hjá øllum teimum, sum hetta hetta viðkemur, er vorðin ótolandi. Tað er tí av stórum týdningi fyri allar partar at fáa greiði á, um nakað hendir í hesum máli, og nær nakað hendir í hesum máli, og loyvi eg mær ti at seta landsstýrismanninum, ið situr fyri sjúkrahúsmálum, hendan fyrispurning.

1. apríl svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR
uppá

fyrispurning frá Jóannesi Dalsgaard, løgtingsmanni um serliga tannlæknaviðgerð á landssjúkrahúsinum.

Umrødda tannlæknaarbeiði, sum í løtuni fer fram, fevnir um tannlæknahjálp í sambandi við gerð av broti á andlitsbein og viðgerð av sjúklingum við øðrum sjúkum í munni og andlitsbeini. Hetta fer fram í samstarvi millum oyrna-nasa-háls lækna og tannlækna. Afturat hesum er kannitgararbeiði hjá teim sjúklingum í psykiatrisku deild, sum eru innlagdir í longri tíð.

Harafturat ketnur tannlæknaarbeiði fyri viðskiftafólk innan andveikaverndina og herundir eisini næmingar á Skúlanum á Tróðni.

Landssjúkrahúsið søkti, fyri fyrstu ferð, eftir tannlækna og klinikassistenti fyri figgjarárið 1982/83. Upplýsast kann, at málið hevur verið til umrøðu fleiri ferðir tey seinastu tiggju árini.

Í viðmerking til umsóknina um tannlækna skrivar læknaráðið á landssjúkrahústnum:

»Í meira enn tiggju ár hevur verið skrivað aftur og fram um setan av tannlækna á landssjúkrahúsinum.

Læknaráðið vil tí heita á stýrið um at játta neyðugan pening á komandi figgjarætlan, soleiðis, at tannlæknastarvið kann lýsast. Ein kann rokna við, at umleið helmingurin av arbeiðinum kemur at umfata sjúklingar á landssjúkrahúsinum (skaðastova, skurðviðgerð, troknað skaðar á psykiatrisku deild). Hin helmingurin umfatar viðskiftafólk innan andveikraverndina og møguliga Skúlan á Tróðni. Utreiðslurnar av seinna helmingi má landssjúkrahúsið so fáa refunderað.«

Útreiðslurnar eru mettar til 427.000,- kr. í lønum til ein tannlækna og ein klinikkassistent. Harafturat koma útreiðslurnar til útbúnan av tannlæknastovuni, ið frá 1. apríl 1981 var mett at kosta 162.000,- kr., soleiðis at útreiðslurnar í tí fyrsta árinum verða umleið 600.000,- kr.

Tá byggingin av statshospitalinum fór fram, vórðu rúm til tannlæknastovu sett

frá í undirhæddini í fyrisitingarbygningunum, og eru hesi rúm framvegis tøk.

Í mun til vanliga tannrøkt, er neyðugt at ein stórur partur av arbeiðinum fer fram, tá ið viðskiftafólkið er í narkosu. Viðgerðin fer fram á skurðgongini á landssjúkrahúsinum, og hevur hetta ikki elvt til trupulleikar hjá læknum ella sjúkrasystrum.

Samlaða upphæddin viðvíkjandi ynski hjá landssjúkrahúsinum, um normering av størvum og keypi av tólum, var 7.871.500,- kr. Hetta metti stýrið at vera alt ov nógv, og mælti ti til, at játtað varð fyri 3,5 mió. kr. Henda upphædd svaraði í stórum til tað, sum stýrið játtaði fyri 1981/82, men sum ikki kom igjøgnum landsstýri og løgting.

Stýrið er av ti fatan, at ynskini, ið stýrið eina ferð fyrr hevur viðmælt, eiga at fáa hægri prioritet enn ynski, ið verða sett fram á fyrsta sinni.

Hetta er so orsøkin til, at stýrið ikki mælti til at søkt var eftir einum tannlækna og einum klinikkassistenti á figgjarlógini 1982/83.

Mett verður, at umsóknin verður endurnýggjað fyri figgjarárið 1983/84, og um stýrið viðmælir ynskjunum, so vil landsstýrið tá viðgera málið við vælvild.

F.L.j.nr. 901-9-17.

---

160. Góðkenning av sáttmála um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir í, at landsstýrið saman við donsku stjórnini undirritar sáttmálan um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum og góðkennir, at sáttmálin verður settur í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Arbeiðið viðvíkjandi eini laksakonventión byrjaði við, at USA og Kanada royndu at finna eina avtalu sínámillum um amerikanskan laks, ið uppihelt sær í kanadiskum sjógvi eina tíð av lívi sínum. Hesi bæði lond samdust so um at bjóða EF til fundar fyri at fáa eina konventión, ið eisini kundi umfata laksin við Grønland, ið partvis er av kanadiskum uppruna.

Av tí at laksurin við Vesturgrønland eisini er av europeiskum uppruna, hildu fleiri europeisk lond tað vera náttúrligt, um konventiónin umfataði bæði vestara og eystara partin av Norðuratlantshavinum, og tóku bæði USA og Kanada undir við hesum.

Umframt EF, Kanada og USA kom fram ímóti ársenda 1980 eisini Noreg við í hetta arbeiði. Síðani varð hildið, at Svøriki, Ísland og Føroyar eisini áttu at koma við, og fekk danska stjórnin tí innbjóðing til at tryggja føroyska luttøku í einum arbeiðsbólkafundi, sum hildin varð í Ottawa í januar 1981. Á hesum fundi varð eftir ynski frá føroyskari síðu avgjørt, at uttanríkismálaráðið læt ein sendistovuskrivara frá ambassaduni í Ottawa luttaka okkara vegna. Hann helt seg har til sjónarmið, ið landsstýrið hevði boðað donsku stjórnini frá, at vit høvdu.

Hini londini ynsktu, at føroyingar lótu seg umboða meira beinleiðis í arbeiðinum, og varð tí leitt einaferð aftrat á okkum um at taka lut á einum sonevndum redaktiónsfundi í Ottawa í mars 1981, sum skuldi arbeiða við einum nýggjum uppskoti til konventiónstekst, aftaná at fyrst Kanada og síðani EF høvdu framsett uppskot til sáttmálatekst.

Á hesum fundi og á arbeiðshólkafundi í Oslo í døgunum 18.—21. mai 1982 og sendinevndarleiðarafundi í Geneve 12.—13. august 1982 vóru Føroyar umboðaðar beinleiðis av skrivstovustjóra í landsstýrinum. Úrslitið av hesum fundum var eitt uppskot til sáttmálatekst, ið viðgjørt varð á ráðstevnu, ið varð hildin í Reykjavik í tíðarskeiðinum 18. - 22. januar 1982. Har luttóku Kanada, Danmark vegna Føroyar, EEC, Ísland, Noreg, Svøriki og USA.

Ráðstevnan góðtók aftaná samráðingarnar ein tekst til sáttmála um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum, og greiddu Kanada, Danmark fyri Føroyar, EEC, Ísland, Noreg og USA atkvøðu fyri sáttmálatekstinum. Orðingin í sáttmálanum var hjáløgd sum skjal til hesa endaligu samtyktina (Final Act). (Sí skjal 1).

Sáttmálin er opin fyri undirriting í Reykjavík frá 2. mars til 31. august 1982.

Sáttmálin skal galda fyri laksastovnar, ið fara út um økir, sum eru undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá strandalondum norðan fyri 36° við Atlantshavið, á allari lívsleið teirra.

Veiða av laksi er bannað uttanfyri tey økir, ið eru undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá strandalondum. Harumframt er laksaveiða bannað innanfyri økir undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá strandalondum uttanfyri 12 fjórðingar, við Vesturgrønland tó uttan fyri 40 fjórðingar. Fyri økið innan fyri fiskimark Føroya er tó eingin slík avmarking.

Eitt altjóða felagsskapur verður settur á stovn, og endamálið hjá felagsskapinum

skal vera við samráðingum og samarbeiði at vera við til varðveiting, endurreising, nøring og skynsama umsiting av laksastovnunum, ið eru undir hesum sáttmála, og skal hetta byggja á tað besta visindaliga grundarlag, ið er til taks.

Sjálvur felagsskapurin er bygdur upp av einum ráði, 3 regionalum kommissiónum (fyri Norðuramerika, Vesturgrønland og Landnyrðingsatlantshav) og einum skrivara.

Føroyar verða limur í kommissiónini fyri landnyrðingspartin av Atlantshavinum.

Innanfyri sítt økið hevur landnyrðingskommissiónin m.a. hesar uppgávur:

a) at verða forum fyri samráðingar og samarbeiði millum limirnar viðvikjandi varðveitslu, endurreising, nøring og skynsamari fyrisiting av teimum laksastovnum, sum eru undir hesum sáttmála,
b) at skjóta upp regulerandi tiltøk fyri fiskiskap í økinum, sum er undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá einum av limunum, av laksi frá áum hjá hinum limalondunum,
c) at koma við ábendingum til ráðið um vísindaligar kanningar.

Kommissiónin skal smb. § 9 hava í huga, tá ið kvotur verða ásettar, m.a.:

c) tann ómakar, sum laksavertslondini gera fyri at seta í verk og halda uppi tiltøk til varðveiting, endureising, nøring og skynsama fyrisiting av laksastovnunum í sínum áum og í økjum, sum eru undir yvirvaldsrætti teirra fiskiskapi viðvikjandi, herundir tiltøk, sum eru umrødd í § 15, 5. stk., litra b),
d) nøgdina av føði, ið laksurin etur á økjum undir yvirvaldsrætti fiskiskapi, viðvikjandi hjá teimum ávikavisu pørtunum (tann sonevnda »grazing fee« reglan),
e) tær lutfalsligu avleiðingarnar av veiðu av laksinum á ymsum stigum á hansara ferðaleið,
f) hjálp frá øðrum pørtum enn upprunalondum til varðveiting av laksastovnum, sum ferðast inn á økir undir teirra yvirvaldsrætti fiskiveiðu viðvikjandi, við at skerja teirra veiðu av slíkum stovnum ella við øðrum tiltøkum, og
g) áhugin hjá samfeløgum, sum serstakliga eru bundin at laksafiskiskapi.

Álagt verður øllum pørtum at geva upplýsingar um viðurskifti í londum teirra av týdningi fyri laksin, m.a. um veiðu og onnur viðurskifti í áum teirra.

Av serligum týdningi er, at sambært grein 15, petti 5 (b) kunnu partarnir, herundir áarlondini, átaka sær skyldur til at gjøgnumføra varðveitingartiltøk. Sum nevnt áður kann dentur verða lagdur á slík tiltøk, tá ið kvotur verða ásettar.

Týdningurin av hesum er fyrst og fremst, at tað á henda hátt ber til at gera ávísar kvotur fyri vertslond (sum Føroyar) treytaðar av, at eisini áarlondini átaka sær ávísar skyldur.

Landsstýrið er sannført um, at tað er rætt, at Føroyar fara upp í tá samvinnu, sum laksasáttmálin skal vera karmur um.

Tað hevur eydnast føroysku umboðunum at fáa sáttmálatekstin, sum upprunaliga bert miðaði ímóti at røkja áhugamálini hjá áarlondunum og at avmarka veiði-

møguleikarnar hjá vertslondunum, broyttan á ein slíkan hátt, at frægari javnvág nú er imillum rættindi og skyldur hjá hesum báðum pørtum, hóast ásannast má, at tað ikki hevur verið politiskt gjørligt at fáa fulla javnvág í lag imillum hesar báðar partar. Tað er meting landsstýrisins, at tað ikki undir núverandi umstøðum hevur verið gjørligt at náa fram til eitt betri úrslit. Um so er, at Grønland fer burtur úr EEC og tiskil ikki longur verður umfatað av sáttmálanum, er tó møguliga bugsandi, at nýggjar samráðingar til ta tíð kundu ført til einstakar broytingar til gagns fyri vertslondini.

Landsstýrið heldur tað ikki vera ráðiligt at standa uttanfyri laksasáttmálan. Royndir okkara seinastu tíðina, saman við royndum frá fyrr av laksafiskiskapi viðvikjandi henda á, at vandin fyri hørðum trýsti frá einstøkum síðum er stórur, og tað er ikki altíð gjørligt at venda hesum trýsti til fyrimuns fyri okkum sjálvar. Við at taka lut í margpartasamvinnu sambært laksasáttmálan fáa vit høvi til at ávirka miðlumlandastøðuna viðvikjandi laksi og minka um vandan fyri trýsti frá einstøkum londum.

Tá ið sáttmálin varð latin upp fyri undirskrift í Reykjavík 2. mars 1982 undirritaðu Ísland, Noreg, EEC og USA.

Sáttmálin fær gildi, tá ið minst 4 partar hava góðkent hann. Av hesum fýra skulu tó vera minst tveir limir í hvørjari kommissión, og skal minst annar teirra hava yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvikjandi í kommissiónsøkinum.

Svøriki tók seg burtur úr samráðingunum í Reykjavík, av tí at teir vóru ónøgdir við at verða útihýstir frá Kommissiónini fyri Vesturgrønland. Óvist er, um Svøriki kortini fer at gerast limur.

Í samband við undirritingina í Reykjavík tann 22. januar 1982 las umboð landsstýrisins upp tvær yvirlýsingar frá Føroya Landsstýri um støðu Føroya til sáttmálan og til avmarkingar í føroysku laksaveiðuni, jbr. skjal 2 og 3.

Um løgtingið góðtekur sáttmálan, verður landsstýrið at geva donsku stjórnini boð um hetta. Síðani verður gjørt av, nær ið undirritast skal. Í samband við undirritingina kann verða boðað frá, at sáttmálin er góðkendur av løgtingimum. Tá ið sáttmálin er komin í gildi partanna millum verður hann lýstur at galda í Føroyum.

SÍ SKJØL. 18 A-F

1. viðgerð 19. apríl. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 19. apríl 1982 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 20. apríl 1982 viðgjørt málið.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jørgin Thomsen, Svend Åge Ellefsen, Jógvan Sundstein og Jógvan I. Olsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (E. Patursson og Petur Reinert) førir fram:

Hetta stórmál — má, ið hevur so miklan týdning — bæði nú og í ókomnari framtíð — hevur als ikki fingið ta viðgerð, sum framsogumaður tjóðveldisfloksins eftirlýsti í talu síni, tá ið málið var til fyrstu viðgerðar í tinginum.

Málið er alt ov týdningarmikið til tess at verða avgreitt so í skundi. Marknaðarnevndin er millumtinganevnd, og mælir minnilutin (Petur Reinert og Erlendur Patursson) til, at málið verður beint aftur til viðgerðar í hesi nevnd, og at marknaðarnevndin leggur fyri tingið álit og uppskot í komandi ólavsøkutingsetu.

Upplýst er í málinum, at freistin til staðfestingar er sett til 31. august 1982, so eisini av hesi grund mælir minnilutin frá at leypa framav og fara fram eftir fummum.

UPPSKOT
til
samtykt

Málið verður beint til viðgerðar í marknaðarnevndini, sum leggur fram álit og uppskot í komandi ólavsøkutingsetu.

2. viðgerð 27. apríl. Uppskotið frá minniluta í nevndini fall við 8-0. Uppskotið frá meiriluta í nevndini samtykt við 21-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 1509-3 II.

---

161. Regulering av føroyska fiskiskapinum í 1982 í kanadiskum sjógvi.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar,

Løgtingið tekur til eftirtektar fiskikvotur føroyinga í kanadiskum sjógvi í 1982 sambært rammusáttmála frá 3. juni 1980 millum Danmark og Kanada um føroysk fiskirættindi í kanadiskum sjógvi.

Viðmerkingar:

Í sambandi við 3. regluliga ársfundin í NAFO í Halifax 8. november 1981 varð fundur hildin millum umboð fyri Føroya landsstýri og kanadisku stjórnina um føroysk fiskirættindi í 1982 í kanadiskum sjógvi sambært rammusáttmálan við Kanada.

Kvotuynski landsstýrisins fyri 1982 vóru:

Øki	Toskur	Svartkalvi
0	—	600
2GH	4.000	200
2J3KL	700	200

Í 1981 vóru kvoturnar:

Øki	Toskur	Svartkalvi
0		1.000
2GH	2.000	
3J3KL	700	

Sambært fotoavrit av telexi frá 16. februar 1981, skjal 1, hevur kanadiska stjórnin samtykt at tilluta Føroyum fylgjandi kvotur fyri 1982:

Øki	Toskur	Svartkalvi
0	—	1.000
2GH	3.000	—
2J3KL	700	—

Umframt hesar nevndu kvotur hava føroyingar í 1982 eins og undanfarin ár atgongd til at veiða hetnara í kanadiskum sjógvi.

Landsstýrið hevur beitt á kanadisku myndugleikarnar um enn einaferð at umhugsa býtið upp á øki av svartkalvakvotuni, soleiðis at t.d. 100 tons verða flutt frá øki 0 til øki 2GH. Enn er ikki greitt um hetta vinski kann eftirlikast.

16.47

61235 tingns fa
31292l etr dk

faeroernes landsstyre
udenrigsministeriet koebenhavn den 16.2.1923 1982 kl. 1648

skal vaere fremme e.d.

faeroeske torskekvoter i canadisk farvand.
oe.p.4.j.nr. 63. faeroerne-canada.

fra den canadiske ambassade har udenrigsministeriet modtaget et brev af 12. februar 1982, der hermed gengives:

»as we discussed, this office has received from ottawa, the 1982 approved fishing plan for faeroes fishery in canadian fishery waters. the plan is detailed below.

side 2

species	stock area	allocation (tons)	daily catch rate (tons)	fishing days	days on ground
cod	2 gh	3000	—	—	670 (1)
cod	2j 3kl	700	9	78	90
g halibut	0	1000	n/a	—	—

a daily catch rate has not been set for cod fishery in the 2 gh area and a liberal allocation of fishery days on the ground has been assigned to enable fishing in an area where bad weather and ice conditions may impede fishing operations. please note that the assigned catch rates in this fishing plan assume that the fishery will be a long-lining operation, otherwise higher rates will be assigned.

we would be grateful if you would pass the above plan to the appropiate faroese authorities as soon as possible.«

oe.p.4./holm pedersen

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir fyrstu viðgerð tann 31. mars 1982 beint í Marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 20. apríl 1982 viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 23. apríl. Uppskotið varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.U.j.nr. 1500-1-11-8.

---

162. Løgtingslóg um orlov í samband við barnsburð og adoptión.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Jona Henriksen, løgtingslimur vegna Javnaðarflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um orlov í samband við barnsburð og adoptión.

§ *1.* Kvinnuligur løntakari hevur rætt til orlov frá arbeiði sínum, orsakað av at hon er við barn og orsakað av barnsburði frá tí degi, ið metast kann at vera 4 vikur áðrenn barnsburð hennara og 14 vikur aftaná barnsburðin (barnsburðarorlov)

lagtingslov om orlov i forbindelse med fødsel og adoption.

§ *1.* En kvindelig lønmodtager har ret til fravær fra arbejdet på grund af graviditet og barsel fra det tidspunkt, hvor der skønnes at være 4 uger til fødslen og til 14 uger efter fødslen (barselorlov).

2. stk. Tó hava foreldrini rætt til í staðin at lata faðirin hava orlov frá arbeiði sínum við løn tær 4 seinastu vikurnar av nevndu 14 vikuskeiði.
3. stk. Í samband við barnsburð hevur faðirin, annars, uttan løn, rætt til orlov frá arbeiði sínum í mesta lagi 1 mánað frá barnsburðardegnum at rokna.
4. stk. Løntakari hevur annars, í teimum tíðarbilum, har hann, sambært tað til eina og hvørja tíð á hesum øki galdandi dagpeningaskipan, hevur rætt til dagpening, rætt til at verða burtur frá arbeiði sínum í samband við at kvinnan er við barn, í samband við barnsburð ella adoptión.

§ 2. Tann tíð, sum løntakarin hevur verið úr arbeiði sínum sambært § 1, verður tikin við í útrokningini av starvsaldri hansara í viðkomandi sturvi.
2. stk. Omanfyri nevnda fyriskipan viðvíkur ikki eftirlønarskipanum.

§ 3. Arbeiðsgevari hevur ikki rætt til at siga upp løntakara, orsakað av at hann hevur kravt rætt sín til orlov ella hevur verið úr starvi sínum sambært § 1, ella annars orsakað av, at kvinnan hevur verið við barn, av barnsburði hennara ella adoptión.

§ 4. Kvinnuligur løntakari, sum hevur orlov, eigur í góðari tíð, tó í seinasta lagi 14 dagar áðrenn orlovið er at enda komið, at boða arbeiðsgevara sínum frá, um hon ynskir at halda fram í starvinum.

§ 5. Tær fyriskipanir, ið hendan lógin

Stk. 2. Dog har forældrene ret til i stedet for at lade faderen få orlov fra arbejdet med løn de sidste 4 uger af nævnte 14-ugers periode.
Stk. 3. I forbindelse med barsel har faderen, ellers, uden løn, ret til orlov fra sit arbejde højst 1 måned fra barselsdagen.

Stk. 4. Lønmodtager har ellers, i de tidsrum, hvor han i henhold til den til enhver tid på dette område gældende dagpengeordning, ret til dagpenge, ret til at være fra sit arbejde i forbindelse med, at kvinden er gravid, i forbindelse med barsel eller adoption.

§ 2. Den tid, en lønmodtager har været fraværende i henhold til § 1, medregnes ved beregning af anciennitet i arbejdsforholdet.

Stk. 2. Ovennævnte bestemmelse vedrører ikke pensionsforhold.

§ 3. En arbejdsgiver må ikke afskedige en lønmodtager, fordi denne har fremsat krav om udnyttelse af retten til fravær eller har været fraværende efter § 1, eller i øvrigt på grund af graviditet, barsel eller adoption.

§ 4. En kvindelig lønmodtager, der har barselsorlov, skal i rimelig tid, dog mindst med 14 dages varsel og senest ved barselsorlovens udløb, underrette arbejdsgiveren om, at hun vil genoptage arbejdet.

§ 5. Lovens bestemmelser kan ikke ved

áseting, kunnu ikki við avtalu broytast soleiðis, at løntakarin fær verri sømdir enn ásett í lógini.

§ 6. Um so er, at arbeiðsgevarin brýtur § 3 og koyrir løntakaran úr starvi, skal arbeiðsgevarin rinda løntakaranum endurgjald.
2. stk. Hetta endurgjald, sum ikki skal verða størri enn svarandi til løn fyri arbeiði í 26 vikur, verður ásett út frá starvstíðini og umstøðunum annars.

§ 7. Føroya Landsstýri fær heimild til at áseta serliga reglugerð fyri sjófólk.

§ 8. Tá barnið, grundað á serligar umstøður hevur serligan tørv á, at foreldrini eru um tað, kunnu avvarðandi myndugleikar gera frávik í teimum fyriskipanum, sum henda lóg áseting.

§ 9. Føroya landsstýri áseting nærri reglugerð fyri framjan av teimum fyriskipanum, ið ásettar eru í lógini.

§ 10. Tær meirútreiðslur, ið standast av hesi fyriskipan, og sum ikki koma undir galdandi dagpeningaskipan, skulu rindast úr landskassanum.

§ 11. Lógin kemur í gildi fyri barnsburðir at rokna frá 1. apríl 1983 og í tí føri, at adoptivbarnið kemur í heimið hjá adoptivforeldrunum frá omanfyri nevnda degi at rokna.

aftale fraviges til ugunst for lønmodtageren.

§ 6. Afskediges en lønmodtager i strid med § 3, skal arbejdsgiveren betale en godtgørelse.

Stk. 2. Godtgørelsen, der ikke kan overstige 26 ugers løn, fastsættes under hensyn til lønmodtagerens ansættelsetid og sagens omstændigheder iøvrigt.

§ 7. Færøernes landsstyre fastsætter særlige regler for søfarende.

§ 8. Hvis barnet, på grund af særlige omstændigheder, har særligt behov for at forældrene tager sig af det, kan vedkommende myndigheder gøre undtagelser i de forskrifter, denne lov fastsætter.

§ 9. Færøernes landsstyre fastsætter nærmere regler for udførelse af de forskrifter, der er fastsat i denne lov.

§ 10. De merudgifter, der kommer af denne anordning, og som ikke kommer under gældende dagpengeordning, skal betales af landskassen.

§ 11. Loven træder i kraft i forbindelse med barsel fra 1. april 1983 og i de tilfælde, da adoptivbarnet kommer i adoptivforældrenes hjem fra ovennævnte dato at regne.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt er tað av størsta týdningi fyri trygdina, trivnaðin, menningina og

heilsuna hjá barni, móður og familjuni sum heild at hava skilagóðar og tíðar høskandi reglur fyri barnsburðarfarloyvi og hvild í sambond við barnsburð.

I grannalondum okkara t.d. Danmark, Noregi og Svoriki eru tey seinastu árini gjordar umfatandi lógir og fyriskipanir til tess at gera alla stoduna í sambond við, at kvinna er við barn, eigur barn, og skal hvila eftir barnsburð, so góða sum møguligt.

Hjá okkum er hetta økið skipað antin í sáttmálum á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum ella við »Lov for Færoerne nr. 644 af 13. december 1978 om dagpenge ved sygdom eller fødsel«. Sum kunnugt er reglan fyri dagpeningi við barnsburð tann í dag, at kvinnan eigur rætt til dagpening 8 vikur eftir barnsburðin. Tó kann hon halda uppat at arbeiða í fyrsta lagi 6 vikur áðrenn barnsburðin, um læknin heldur tað vera óforsvarligt, at hon heldur fram við at arbeiða. Henda regla hevur sambond við tað slag av arbeiði, ið kvinnan hevur, og gevur sostatt ikki generelt øllum barnakonum rætt til orlov áðrenn barnsburð.

Í ymiskum sáttmálum sum t.d. sáttmálanum millum landsstýrið og postfelagið er talan um munandi betri skipan í sambond við barnsburð. Somuleiðis er tað sáttmálar, ið fevna um adoptión, nakað sum beldur ikki er tikið við í gildandi dagpeningaskipan.

Samanbera vit okkara reglur fyri barnsburðaorlov við t.d. tær donsku, so er at stórur munur er. Danskar barnakonur hava treytaleyst rætt til orlov 4 vikur áðrenn barnsburð og 14 vikur aftaná barnsburð.

Tað er tí eyðsæð, at stoðan hjá okkara barnakonum og nýfødingum ikki kann metast javnt við stoðuna í grannalondum okkara, og er tí grund til at gera álvarur í okkara reglum um farloyvi við barnsburð og hvild í sambond við hendan.

Men sjálvsagt eru aðrar og meiri tungtvigandi grundir fyri at seta í verk generellar reglur um munandi longri orlov fyri allar barnakonur, og skulu nakrar av hesum grundum nevnast her. Hesar grundir fevna um umhugsni fyri barninum, mammuni og familjulívinum sum heild.

Heilsi eru samfelagsligar grundir, ið tala fyri munandi betri barnsburðar orlov.

Faka vit barnið fyrst, sum rímiligt er, so er øllum kunnugt, hvussu mógv tað hevur at siga fyri barnsins menning, at barnið er trygt frá ti fyrstu, tað kemur úr móðurlívi.

Tað er samstundis greitt, at treytirnar fyri at barnið kann vera trygt, er tann, at foreldrini eru trygg, og hava tey allar fortreytir í so máta, um umstøðurnar kring barnsburðin eru so góðar sum yvirhøvur gjørligt, t.v.s. at tey hava góða tíð, eru úthvíld, ikki hava ov stórar peningaligar trupulleikar og ikki nýtast at stura fyri at missa arbeiðið o.s.fr.

Hugsa vit um móðurina sjálva, er heldur eingin ivi um, at longri barnsburðarorlov undir tryggum búskaparligum og heimligum umstøðum fer at verða bót fyri heilsu hennara, og harvið verður eitt betri burðarorlov eisini ein bati fyri fólkaheilsuna (tað finnast rúgvumiklar bókmentir um hetta og kann her vera vist á álit nr. 846 frá donsku barnanevndini og donsku javnstøðisnevndini). Fremmi samfelagsligu fyrimunir eru við eini longri burðarorlov:

Fyri tað fyrsta verður trýstið á vøggustovurnar minni, tá ið pinkubarnini verða

longri heima, og harmæst verða fleiri fólk at koma í arbeiði fyri tær kvinnur og teir menn, sum eru í orlov.

Uppskotið er nær tengt at dagpeningaskipanini, og metir uppskotsstillarin Føroya Javnaðarflokkur tí, at tað er neyðugt, at tann nevnd, ið endurskoðar dagpeningaskipanina, eisini hevur lógaruppskotið í huga, og setir Javnaðarflokkurin tí fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar.

Løgtingið álegguur landsstýrinum at lata ta dagpeningganevnd, ið sambært løgtingssamtykt í tingmáli nr. 48/1981 viðger dagpeningaskipanina, endurskoða reglurnar um dagpening við barnsburð, soleiðis at tær hóska til tær nýskipanir, ið fylgja við lógaruppskotinum um orlov í samband við barnsburð og adoptión (tingmál nr. 162/1981).

UPPSKOT

Um uppskotið er stutt at siga, at tað gevur kvinnuni sum løntakara treytaleysan rætt til at verða burtur frá arbeiði, orsakað av at hon er við barn, 4 vikur frá tí at barnsburðurin er mettur at verða og 14 vikur eftir barnsburð. Kvinnan skal eftir hesum uppskoti ikki prógva, at hon er óarbeiðsfør í hesum tíðarskeiði.

Rætturin til orlov merkir, at hon hevur lógligt forfall og kann tí ikki missa nøkur av teimum rættindum, sum hon hevur á arbeiðsplássinum, sum t.d. starvsaldur o.l. Lógin snýr seg bert um rættin til at vera burtur frá arbeiði, meðan tann peningaligi spurningurin, sum nevnt er, verður loystur við endurskoðan av dagpeningaskipanini. Javnaðarflokkurin metir tað skilabest, at landskassin ber allar meirútreiðslur av hesi skipan.

Mett verður eisini, at tað er av stórum týdningi fyri móður og barn, at eisini faðirin fær høvi til at vera heima í samband við barnsburð. Uppskotið gevur faðirinum rætt til orlov í ein mánað uttan løn frá barnsburðardegnum og orlov í 4 vikur við løn tær seinastu 4 vikurnar av orlovskeiðinum. Hetta skal skiljast soleiðis, at faðirin og móðirin sjálv kunnu avtala, hvør ið skal hava fri tær seinastu 4 vikurnar við løn.

Samanumtikið miðar uppskotið ímóti at styrkja støðuna hjá foreldrum og børnum, so vítt møguligt at javna út munin í millum ymsar løntakarabólkar og av ymiskum grundum at javnstilla adoptivforeldur við onnur foreldur.

1. viðgerð 20. apríl. Málið varð beint í sosialu nevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er lagt fram av Javnaðarflokkinum og varð við 1. viðgerð hin 20. apríl 1982 beint í sosialu nevndina.

Uppskotið umfatar stórt sæð allan problematikkin, sæð út frá løggávusiðu viðvikjandi arbeiðsfrítøku í sambandi við barnsburð. Sosiala nevndin metir seg ikki at hava møguleika fyri, aðrenn tingið fer heim, at arbeiða nóg gjølliga við uppskotinum og mælir ein meiriluti (Jógvan Sundstein, Frederik Olsen og Eli Nolsøe) til at biðja landsstýrið arbeiða víðari við uppskotinum.

Meirilutin setir fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Tingmál nr. 162/1981: Orlov í sambandi við barnsburð og adoptión verður sent landsstýrinum við áheitan um at arbeiða víðari við málinum.

Uppskotsstillarin hevur eisini eitt uppskot til samtyktar, sum nevndin tekur undir við.

Minnilutin (Sverri Midjord og Karin Kjølbro) ásannar, at stórur tørvur er á longri og betri barnsburðarorlov og tekur tí undir við uppskoti javnaðarfloksins við hesum broytingum:

Í § 4 verður orðið »at« sett inn imillum »um« og »hon«.

§ 8 verður orðað soleiðis:
»Um barnið í sínum fyrsta liviári hevur serligan tørv á, at foreldrini eru um tað, kann tíðarskeiðið í § 1 verða longt eftir tilmæli og váttan frá lækna.«

§ 8 affattes således:
»Hvis barnet i sit første leveår har særligt behov for, at forældrene tager sig af det, kan tidsrummet i § 1 forlænges efter henstilling og attest fra en læge«.

§ 10 gongur út.

§ 10 udgår.

Minnilutin metir broytingarnar í §§ 4 og 8 at vera mest av teknískum slagi, meðan hann metir, at ásetingin í § 10 eigur at standa í dagpeningalógini og tí eigur at verða strikað her.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskot frá minniluta í nevndini fall við 12-0, og broytingar-

uppskot til § 4 og § 8 fall við 11-0 atkvøðum.

Lógaruppskotið § 1 fall við 11-0 og sostatt burturfallið. Uppskotini til samtyktar I og II samtykt við 19-0 atkvøðum.

F.T.j.nr.626-1.

---

163. Løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m.

lagtingslov om fritidsundervisning m.m.

1. TÁTTUR

Hugtak fritíðarundirvísingarinnar.

§ *1.* Fritíðarundirvísing v.m. er undirvísing og virksemi, sum verða boðin eftir hesi lóg, ið er givin út sambært rammulóg fyri Føroyar um fritíðarundirvísing v.m.

KAPITEL 1.

Fritidsundervisningens begreb.

§ *1.* Fritidsundervisning m.v. er undervisning og virksomhed tilbudt efter denne lov, der er udstedt i henhold til rammelov for Færøerne og fritidsundervisning m.v.

2. TÁTTUR

Almenn fritíðarundirvísing

§ *2.* Við almenna fritíðarundirvísing i

KAPITEL 2.

Almen fritidsundervisning.

§ *2.* Ved almen fritidsundervisning

hesi lóg meinast við undirvísing í teimum evnum, sum íbúgvararnir yvir 14 ár í frítíðini ynskja at fáa undirvísing í.

2. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um almenna frítíðarundirvísing.

3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis, herímillum avmarkingar í undirvísingarevnunum.

4. stk. Landsskúlafyrisitingin kann undir serligum umstøðum loyva ungfólki undir 14 ár at luttaka í frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

§ *3.* Kommunurnar seta á stovn almenna frítíðarundirvísing. Tær einstøku kommununar hava skyldu til at tryggja íbúgvunum í kommununi eitt fjølbroytt tilboð um almenna frítíðarundirvísing í einum vavi, sum hóskandi er til viðurskiftini í kommununi. Hetta kann gerast við sjálvstøðugari stovnsseting av frítíðarundirvísing, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til frítíðarundirvísing í øðrum kommunum ella við samarbeiði við aðrar undirvísingarstovnar ella felagsskapir.

2. stk. Tær einstøku kommununar hava skyldu til at taka imóti íbúgvum úr øðrum kommunum til frítíðarundirvísing eftir hesum tátti.

3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur fyri skyldu kommununnar eftir 1. og 2. stk.

§ *4.* Almenn frítíðarundirvísing skal lúka hesar treytir:

forstås i denne lov undervisningen i de emner, hvori befolkningen over 14 år i fritiden måtte ønske undervisning.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte generelle regler om almen fritidsundervisning.

Stk. 3. Undervisningsrådet kan godkende regler om undervisningens indhold og tilrettelæggelse, herunder begrænsninger i emnekredsen.

Stk. 4. Undervisningsdirektoratet kan under særlige omstændigheder tillade unge under 14 år at deltage i fritidsundervisningen efter dette kapitel.

§ *3.* Kommunerne etablerer almen fritidsundervisning. De enkelte kommuner har pligt til at sikre kommunens beboere et alsidigt tilbud om almen fritidsundervisning i et efter kommunens forhold rimeligt omfang. Dette kan ske ved selvstændig etablering af fritidsundervisningen, ved samarbejde med andre kommuner, ved henvisning til fritidsundervisning i andre kommuner eller ved samarbejde med andre undervisningsinstitutioner eller organisationer.

Stk. 2. De enkelte kommuner har pligt til at modtage andre kommuners beboere til almen fritidsundervisning efter dette kapitel.

Stk. 3. Undervisningsrådet kan godkende regler for kommunens forpligtelser efter 1. og 2. stk.

§ *4.* Almen fritidsundervisning skal opfylde følgende betingelser:

1) Undirvisingin skal standa øllum í boði.
2) Undirvisingin skal verða løgd til rættis eftir eini ætlan, sum tryggjar, at givin verður ein verulig undirvising við eini fjølbroyttari lýsing av evninum. Hon kann somuleiðis verða løgd til rættis sum lesiringar, fyrilestrarøðir ella sovorðið.
3) Undirvisingin skal í minsta lagi fevna um 20 tímar í hvørjum evni og í mesta lagi 120 tímar í hvørji lærugrein.
4) Undirvisingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.
5) Lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at kunna undirvisa í viðkomandi evnum.

2. stk. Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

1) Undervisningen skal stå åben for alle.
2) Undervisningen skal være tilrettelagt efter en plan, som sikrer, at der gives en egentlig undervisning med en alsidig belysning af emnet. Den kan endvidere tilrettelægges som studiekredse, foredragsrækker eller lignende.
3) Undervisningen skal omfatte mindst 20 timer i hvert emne og højst 120 timer i hvert fag.
4) Undervisningen skal gennemføres i egnede lokaler med fornødent udstyr.
5) Lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at undervise i de pågældende emner.

Stk. 2. Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1.

3. TÁTTUR

Serstøk fritíðarundirvísing.

§ 5. Kommunurnar hava skyldu til í tí vavi, sum tørvur er á, at seta á stovn serstaka fritíðarundirvising fyri íbúgvararnar yvir 14 ár, sum fevnir um:

1) royndarfyrireikandi undirvising, sum eftir ynski hjá tí einstaka luttakaranum kann enda við góðkendari roynd ella prógtøku,
2) yrkiskenda undirvísing, sum miðar ímóti einum ávisum arbeiðsumráði,
3) serundirvísing.

2. stk. Landsstýrið kann áseta almenn-

KAPITEL 3.

Særlig fritidsundervisning.

§ 5. Kommunerne har pligt til, i det omfang, der er behov herfor, at etablere særlig fritidsundervisning for befolkningen over 14 år omfattende:

1) prøveforberedende undervisning, der efter den enkelte deltagers ønske kan afsluttes med godkendt prøve eller eksamen,
2) erhvervsmæssig undervisning med sigte mod et bestemt arbejdsområde,
3) specialundervisning.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte gene-

ar reglur um serstaka fritíðarundirvísing.

3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis.

4. stk. Landsskúlaráðið ásetir, um skylda kommunanna eftir 1. stk. skal lúkast við sjálvstøðugari skipanarting av undirvísing av hesum slagi, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til undirvísing í øðrum kommunum ella til kommunalar ella ikki-kommunalar skúlar v.m.

§ 6. Skeiðini skulu lúka hesar treytir:

1) Undirvísingin skal standa øllum í boði.
2) Undirvísingin skal verða løgd til rættis samsvarandi teimum ætlanum, sum eru ásettar fyri viðkomandi lærugrein ella evni.
3) Undirvísingin skal vera ókeypis.
4) Undirvísingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.
5) Lærararnir skulu hava neyðuga útbúgving fyri at geva viðkomandi undirvísing.

2. stk. Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

§ 7. Lærarar á øðrum undirvísingarstovnum v.m. kunnu eftir nærri meginreglum, sum Landsskúlaráðið ásetir, taka á seg ta í hesum látti nevndu fritíðarundirvísing við samsvarandi niðurskurði í tí skylduga undirvísingartímatalinum á viðkomandi stovni.

relle regler om særlig fritidsundervisning.

Stk. 3. Undervisningsrådet kan godkende regler om undervisningens indhold og tilrettelæggelse.

Stk. 4. Undervisningsrådet fastsætter, hvorvidt kommunernes pligt efter stk. 1 skal opfyldes ved selvstændig etablering af undervisning af denne art, ved samarbejde med andre kommuner, ved henvisning til andre kommuners undervisning eller til kommunale eller ikke-kommunale skoler m.v.

§ 6. Kurserne skal opfylde følgende betingelser:

1) Undervisningen skal stå åben for alle.
2) Undervisningen skal være tilrettelagt i overensstemmelse med de planer, der er fastlagt for det pågældende fag eller emne.
3) Undervisningen skal være vederlagsfri.
4) Undervisningen skal gennemføres i egnede lokaler med fornødent udstyr.
5) Lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at give den pågældende undervisning.

Stk. 2. Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1.

§ 7. Lærerne ved andre undervisningsinstitutioner m.v. kan efter nærmere af Undervisningsrådet fastsatte retningslinier overtage undervisningen ved den i nærværende kapitel omhandlede fritidsundervisning med en tilsvarende nedsættelse af det pligtige under-

§ *8.* Teir næmingar, sum fáa undirvísing í samsvarandi lærugrein/um í fólkaskúlanum ella á øðrum undirvísingarstovnum, kunnu bert luttaka í serstakari fritiðarundirvísing eftir hesum átti við loyvi frá Landsskúlafyrisitinginí.

visningstimetal ved den pågældende institution.

§ *8.* Deltagelse i særlig fritidsundervisning efter nærværende kapitel af elever, der modtager undervisning i tilsvarende fag i folkeskolen eller andre undervisningsinstitutioner, kan kun ske efter tilladelse af Undervisningsdirektoratet.

4. TÁTTUR

Fritiðarvirksemi.

§ *9.* Í hvørji kommunu verður við kommunalum ella privatum fyritaksserni sett á stovn fritiðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár sambært reglunum í hesum átti.

2. stk. Býar/bygdarráðið skal ansa eftir, at tað verður tryggjað børnum og ungfólki undir 25 ár eitt fjølbroytt tilboð um fritiðarundirvísing í einum vavi, sum hóskandi er til viðurskiftini í kommununi.

3. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um fritiðarvirksemi.

4. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um innihaldið í tilboðnum.

5. stk. Kommunan skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, veita studning til fritiðarvirksemi eftir 1. stk.

§ *10.* Ein kommuna kann góðkenna, at fólk yvir 25 ár luttaka í fritiðarvirksemi av tí slagi, sum umrøtt er í § 9.

2. stk. Ein kommuna kann somuleiðis

KAPITEL 4.

Fritidsvirksomhed.

§ 9. I hver kommune etableres på kommunalt eller privat initiativ fritidsvirksomhed for børn og unge under 25 år i henhold til bestemmelserne i dette kapitel.

Stk. 2. By/bygderådet skal påse, at der sikres børn og unge under 25 år et alsidigt tilbud om fritidsvirksomhed i et efter kommunens forhold rimeligt omfang.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte generelle regler om fritidsvirksomhed.

Stk. 4. Undervisningsrådet kan godkende nærmere regler om tilbudets indhold.

Stk. 5. Kommunen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte bestemmelser yde tilskud til fritidsvirksomhed efter stk. 1.

§ *10.* En kommune kan godkende, at personer over 25 år deltager i fritidsvirksomhed af den i § 9 omhandlede art.

Stk. 2. En kommune kan ligeledes god-

góðkenna, at fritiðarvirksemi bert verður skipað fyri fólk yvir 25 ár.

3. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um fritiðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.

4. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í fritiðarvirkseminum eftir 1. og 2. stk.

5. stk. Landsskúlaráðið góðkennir reglur um, hvussu og í hvørjum vavi kommunurnar kunnu veita studning til fritiðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.

§ *11.* Fritiðarvirksemið skal fáka hesar treytir:

1) Fritiðarvirksemið skal vera lagt til rættis fyri øll og standa øllum í boði eftir almennum metingarstøði.
2) Fritiðarvirksemið skal fara fram í egnaðum hølum ella á uttandura plássum við neyðugum útbúnaði.

2. stk. Landsskúlafyrisitingin kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk., eins og hon kann áseta avmarkingar í talinum á ti virksemisslagi, sum tann einstaki við studningsvirkan kann luttaka í.

kende, at der etableres fritidsvirksomhed udelukkende for personer over 25 år.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte generelle regler for fritidsvirksomhed efter stk. 1 og 2.

Stk. 4. Undervisningsrådet kan godkende regler om indholdet af fritidsvirksomheden efter stk. 1 og 2.

Stk. 5. Undervisningsrådet godkender regler for, hvorledes og i hvilket omfang kommunerne kan yde tilskud til fritidsvirksomhed efter stk. 1 og 2.

§ *11.* Fritidsvirksomheden skal opfylde følgende betingelser:

1) Fritidsvirksomheden skal være tilrettelagt for og stå åben for alle efter generelle kriterier.
2) Fritidsvirksomhed skal gennemføres i egnede lokaler eller udendørs anlæg med fornødent udstyr.

Stk. 2. Undervisningsdirektoratet kan i særlige tilfælde tillade afvigelser fra bestemmelserne i stk. 1, ligeledes kan det fastsætte begrænsninger i det antal former for virksomhed, den enkelte med tilskudsvirkning kan deltage i.

5. TÁTTUR

Høli v.m.

§ *12.* Bý/bygdaráðið skal eftir reglum, sum Landsskúlaráðið góðkennir, útvega egnað høli ella uttandura pláss við neyðugum útbúnaði til fritiðarundirvísing og fritiðarvirksemi fyri íbúgvarnar.

2. stk. Skúlar, onnur egnað høli og uttandura pláss, sum tað almenna eigur,

KAPITEL 5.

Lokaler m.v.

§ *12.* By/bygderådet skal efter regler, der godkendes af Undervisningsrådet, tilvejebringe egnede lokaler eller udendørs anlæg med fornødent udstyr til fritidsundervisning og fritidsvirksomhed for beboerne.

Stk. 2. Skoler, andre egnede lokaler og udendørs anlæg, der tilhører det of-

skulu vera til taks ókeypis við ljósi, varma, reingerð, neyðugari umsjón og verandi útbúnaði v.m. í ti vavi, ið er sambæriligt við nýtslu teirra annars.

3. stk. Aðrir skúlar, høli og uttandura pláss, sum lands- og/ella ríkiskassin til rakstur og/ella bygging hava goldið lán/og/ella studning, skulu við neyðugum útbúnaði og í ti vavi, sum er sambæriligt við nýtslu teirra annars, vera til taks eftir reglum, sum Landsskúlaráðið góðkennir.

fentlige, skal stilles til rådighed vederlagsfrit med lys, varme, rengøring, fornødent opsyn og bestående udstyr m.v. i det omfang, det er foreneligt med deres øvrige brug.

Stk. 3. Andre skoler, lokaler og udendørs anlæg, til hvis drift og /eller anlæg der er udbetalt lån og/eller tilskud fra lands- og/eller statskassen, skal med fornødent udstyr i det omfang, der er foreneligt med deres brug, stilles til rådighed efter regler, der godkendes af Undervisningsrådet.

6. TÁTTUR

Fyrisitingar reglur

§ *13.* Bý/bygdaráðið skal syrgja fyri, at kommununnar íbúgvum standa fritíðarundirvísing og -virksemi í boði eftir hesi lóg.

2. stk. Bý/bygdaráðið skal áseta á ta árligu figgjarætlanina rammurnar fyri fritíðarundirvísing eftir 2. tátti og fritíðarvirksemi eftir 4. tátti og hava tey neyðugu figgjarevni tøk til endamáli.

3. stk. Landsskúlaráðið kann áseta eitt minstamark og mesta mark fyri vavið á skyldunum hjá tí einstøku kommunu eftir 2. og 4. tátti.

KAPITEL 6.

Administrative bestemmelser.

§ *13.* By/bygderådet skal drage omsorg for, at der tilbydes kommunens beboere fritidsundervisning og -virksomhed i henhold til denne lov.

2. stk. By/bygderådet skal på det årlige budget fastsætte rammerne for fritidsundervisning efter kap. 2 og fritidsvirksomhed efter kap. 4 og stille de fornødne midler til rådighed herfor.

Stk. 3. Undervisningsrådet kan fastsætte en nederste og en øverste grænse for omfanget af den enkelte kommunes pligter efter kapitel 2 og 4.

§ *14.* Skúlanevndin skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, á hvørjum ári senda uppskot til bý/bygdaráðið um eina ætlan um tilboð um fritíðarundirvísing og fritíðarvirksemi eftir 2. og 4. tátti í hesi lóg. Leiðarin av fritíðarundirvísingini v.m. í kommununi ger uppskotið.

2. stk. Um so er, at tann ætlan, ið skúl-

§ *14.* Skolekommissionen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte regler hvert år fremsende forslag til by/bygderådet til en plan for tilbud om fritidsundervisning og fritidsvirksomhed efter nærværende lovs kapitler 2.— 4. Forslaget udarbejdes af lederen af fritidsundervisningen m.v. i kommunen.

Stk. 2. Den af skolekommissionen ud-

anevndin sendir bý/bygdaráðnum sbr. 1. stk., ikki fer út um tær rammur, sum eru ásettar á figgjarætlanini fyri fritíðarundirvísing ella -virksemi eftir ávikavist 2. og 4. tátti, skal bý/bygdaráðið senda hana viðari til Landsskúlafyrisitingina til endaliga góðkenning. Um so er, at ætlanin fer út um tær ásettu rammur fyri fritíðarundirvísing v.m. eftir 2. ella 4. tátti ella báðum táttum, skal ætlanin, áðrenn hon verður send viðari til Landsskúlafyrisitingina til endaliga góðkenning, viðgerast í bý/bygdaráðnum, sum tekur avgerð um møguligar broytingar í ætlanini, í tann mun hon fer út um tær rammur, sum ásettar eru á figgjarætlanini.

3. stk. Bý/bygdaráðið skal fyriskipa, at tann árliga ætlanin um kommununnar tilboð um fritíðarundirvísing og -virksemi verður send Landsskúlafyrisitingini innan 1. juli.

§ *15.* Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, leiða ta fritíðarundirvísing v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglunum í hesi lóg.

2. stk. Um so er, at ein kommuna hevur fleiri skúlaleiðarar, men ongan leiðandi skúlastjóra, so tilnevnir kommunan ein av skúlaleiðarunum at taka sær av tí í 1. stk. nevndu uppgávu. Landsskúlaráðið skal góðkenna hesa tilnevning.

3. stk. Eftir tilmæli frá ti í 1. stk. nevnda leiðara kann eitt bý/bygdaráð, eftir at tað hevur fingið ummæli frá skúlanevndini, seta leiðaranum eitt ella fleiri hjálparfólk, sum undir eftirliti

arbejdede plan, jfr. stk. 1, skal, såfremt den ikke går ud over de rammer, der er fatsat i budgettet for fritidsundervisning eller -virksomhed efter henholdsvis kapitel 2 og kapitel 4, af by/bygderådet videresendes til Undervisningsdirektoratet til endelig godkendelse. Går planen ud over de fastsatte rammer for fritidsundervisning m.v. for kapitel 2 eller kapitel 4 eller begge kapitler, skal planen, forinden den videresendes til Undervisningsdirektoratet til endelig godkendelse behandles i by/bygderådet, der træffer beslutning om eventuelle ændringer i planen, i det omfang den overskrider de i budgettet fastlagte rammer.

Stk. 3. By/bygderådet skal foranledige, at den årlige plan om kommunens tilbud for fritidsundervisning og -virksomhed indsendes til undervisningsdirektoratet inden den 1. juli.

§ *15.* Lederen af en kommunes skolevæsen skal efter nærmere af Undervisningsrådet godkendte regler lede den fritidsundervisning m.v., der etableres i kommunen efter bestemmelserne i denne lov.

Stk. 2. Har en kommune med flere skoleledere ingen ledende skoleinspektør, udpeger kommunen en af skolelederne til at varetage den i stk. 1 nævnte opgave. Den foretagne udpegning skal godkendes af Undervisningsrådet.

Stk. 3. Efter indstilling af den i stk. 1 nævnte leder kan et by/bygderåd efter indhentet udtalelse af skolekommissionen ansætte en eller flere medhjælpere for lederen, der under dennes tilsyn

leiðarans tekur sær av teimum uppgávum, sum eru lagdar á hann eftir 1. stk.

4. stk. Landsskúlafyrisitingin kann áleggja einum bý/bygdaráði at seta leiðaranum eitt hjálparfólk. Setanin fer fram eftir teimum í 3. stk. nevndu reglum.

5. stk. Landsskúlaráðið góðkennir tær nærri reglurnar fyri ti virksemi v.m., sum tað í 3. stk. nevnda hjálparfólk kann útinna og fyri eftirlitinum við ti.

6. stk. Landsskúlaráðið ásetir setanarkorini, herímillum somuleiðis lønina hjá leiðarum, hjálparfólki eftir § 15, 3. stk. og lærarum við fritíðarundirvísingina v.m.

§ *16.* Bý/bygdaráðið og skúlanevndin hava skyldu til at tryggja, at ásetanirnar í hesi lóg verða framdar.

2. stk. Tær skyldur, sum bý/bygdaráðið og skúlanevndin hava eftir hesi lóg, kunnu eftir góðkenning Landsskúlaráðsins heilt ella lutvíst latast einum felagsskúlastýri og viðkomandi felagsskúlanevnd ella øðrum kommunalum felagsskapi upp í hendi.

§ *17.* Landsskúlafyrisitingin skal tryggja neyðuga samskipan millum fritíðarundirvísingina v.m. eftir hesi lóg í teimum einstøku kommunum og millum hesa undfirvísing v.m. og undirvísingina í øðrum undirvísingarstovnum.

2. stk. Landsskúlaráðið kann seta í verk landsumfatandi fritíðarundirvísing v.m.

varetager de opgaver, der er pålagt ham efter stk. 1.

Stk. 4. Undervisningsdirektoratet kan pålægge et by/bygderåd at ansætte en medhjælper for lederen. Ansættelsen sker efter de i stk. 3. anførte regler.

Stk. 5. Undervisningsrådet godkender de nærmere regler for den virksomhed m.v., den i stk. 3 omhandlede medhjælper kan udøve og for tilsynet hermed.

Stk. 6. Undervisningsrådet fastsætter ansættelsesvilkårene, herunder tillige aflønningen for ledere, medhjælpere efter § 15, stk. 3, og lærere ved fritidsundervisningen m.v.

§ *16.* By/bygderådet og skolekommissionen har pligt til at sikre gennemførelsen af bestemmelserne i denne lov.

Stk. 2. By/bygderådet og skole kommissionens pligter efter denne lov kan efter godkendelse af Undervisningsrådet helt eller delvist overtages af en forbundsstyrelse, respektive forbundsskolekommission eller anden kommunal sammenslutning.

§ *17.* Undervisningsdirektoratet skal sikre den fornødne koordination mellem de enkelte kommuners fritidsundervisning m.v. efter denne lov og mellem denne undervisning m.v. og undervisning ved andre undervisningsinstitutioner.

Stk. 2. Undervisningsrådet kan iværksætte landsomfattende fritidsundervisning m.v.

7. TÁTTUR

Studningsreglur v.m.

§ *18.* Kommunan rindar allar útreiðslur til góðkenda fritíðarundirvísing v.m. eftir 2.—4. tátti í hesi lóg, um so er, at ikki annað er ásett í lóg ella reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent.

2. stk. Landsskúlafyrisitingin áseir, í hvønn mun tær goldnu útreiðslurnar kunnu vera góðkendar sum studningsheimilaðar, eins og hon ásetir, hvussu útreiðslurnar skulu býtast millum tvær ella fleiri kommunur, um so er, at íbúgvarnir í eini kommunu luttaka í fritíðarundirvísing v.m., sum er fyriskipað og góðkend av øðrum kommunum ella stovnum.

3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna ahnennar reglur um tey í 2. stk. nevndu viðurskifti.

§ *19.* Luttakarar í almennari fritíðarundirvísing eftir 2. tátti skulu rinda eitt gjald, sum Landsskúlafyrisitingin hevur góðkent.

2. stk. Luttøka í serstakari fritíðarundirvísing eftir 3. tátti er ókeypis.

3. stk. Luttakarar í fritíðarvirksemi eftir 4. tátti skulu sjálvir rinda ein part, sum Landsskúlafyrisitingin hevur góðkent.

§ *20.* Landskassin veitir studning til útreiðslur kommununna til virksemi eftir hesi lóg.

2. stk. Studningurin er 50% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda, almenna fritíðarundirvísing eftir 2. tátti og 100 % av teimum stud-

KAPITEL 7.

Tilskudsregler m.v.

§ *18.* Samtlige udgifter til godkendt fritidsundervisning m.v. efter denne lovs kapitel 2 – 4 afholdes af kommunen, såfremt andet ikke måtte være fastsat ved lov eller bestemmelser godkendt af Undrevisningsrådet.

Stk. 2. Undervisningsdirektoratet fastsætter, i hvilket omfang de afholdte udgifter kan godkendes som tilskudsberettigede, ligesom det fastsætter, hvorledes udgifterne skal fordeles mellem to eller flere kommuner, hvis en kommunes beboere deltager i fritidsundervisning m.v., etableret og godkendt af andre kommuner eller institutioner.

Stk. 3. Undervisningsrådet kan godkende generelle regler om de i stk. 2 omhandlede forhold.

§ *19.* Deltagere i almen fritidsundervisning efter kapitel 2 skal betale et vederlag, der godkendes af Undervisningsdirektoratet.

Stk. 2. Deltagelse i særlig fritidsundervisning efter kapitel 3 er vederlagsfri.

Stk. 3. Deltagere i fritidsvirksomhed efter kapitel 4 skal selv afholde en af Undervisningsdirektoratet godkendt andel.

§ *20.* Af landskassen ydes tilskud til kommunernes udgifter til virksomhed efter denne lov.

Stk. 2. Tilskudet udgør 50% af de tilskudsberettigede udgifter til godkendt almen fritidsundervisning efter kapitel 2 og 100% af de tilskudsberettigede

ningsheimilaðu útreiðslunum til góðkenda, serstaka frítíðarundirvising eftir 3. tátti.
3. stk. Til frítíðarvirksemi eftir 4. tátti kann landskassin veita kommunum í mesta lagi 50% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum.
4. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um, hvør skal bera útreiðslurnar eftir hesi lóg.

§ *21.* Býar/bygdaráðið skal árliga innan 1. juli senda Landsskúlafyrisitingini ein av grannskoðara kommununnar áteknaðan roknskap fyri góðkent virksemi eftir hesi lóg.
2. stk. Við støði í tí grannskoðaðu roknskapinum ger Landsskúlafyrisitingin eitt endaligt útreiðslubýti millum kommununa og landskassan.

3. stk. Landsskúlafyrisitingin kann áseta nærri reglur um tilevningina v.m. av roknskapinum.

udgifter til godkendt særlig fritidsundervisning efter kapitel 3.

Stk. 3. Til fritidsvirksomhed efter kapitel 4 kan landskassen yde kommunerne et tilskud på op til 50% af de tilskudsberettigede udgifter.
Stk. 4. Undervisningsrådet kan godkende nærmere regler for afholdelse af udgifterne efter denne lov.

§ *21.* By/bygderådet skal årligt inden 1. juli til Undervisningsdirektoratet indsende et af kommunens revisor påtegnet regnskab for godkendt virksomhed efter denne lov.
Stk. 2. Undervisningsdirektoratet foretager på grundlag af det reviderede regnskab en endelig fordeling af udgifterne mellem kommunen og landskassen.
Stk. 3. Undervisningsdirektoratet kan fastsætte nærmere regler for regnskabets udformning m.v.

8. TÁTTUR

Aðrar ásetingar

§ *22.* Landsskúlafyrisitingin kann veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti til frítíðarundirvising v. m., allan ella lutvisan studul. Hon kann skipa fyri, at skeið verða hildin.

§ *23.* Settur verður á stovn ein grunnur, sum kann veita studning og/ella lán til tess at fremja frítíðarundirvising v.m. eftir hesi lóg.
2. stk. Grunninum verður árliga veitt

KAPITEL 8

Andre bestemmelser

§ *22.* Undervisningsdirektoratet kan yde hel eller delvis støtte til ledere og læreres deltagelse i uddannelseskurser med henblik på fritidsundervisning m.v. Det kan foranledige kurser afholdt.

§ *23.* Der oprettes en fond, hvoraf der kan ydes tilskud og/eller lån til fremme af fritidsundervisning m.v. efter denne lov.
Stk. 2. Der tilskrives årligt fonden et

ein peningaupphædd, ið svarar til 5% av øllum studningsheimiladum útreiðslum til góðkenda fritíðarundirvising v.m. eftir 2.—4. tátti í hesi lóg. Av ti veittu upphæddini rinda kommununar 50% og landskassin 50%. Kommununna partur verður deildur við helvtini eftir íbúgvatali og helvtini eftir skattainntøkuni.

3. stk. Í grunnin koma sonuleiðis rentur og avdráttir av teimum lánum, sum grunnurin hevur veitt, eins og tær ser støku árligu játtanir, ið ásettar eru á fíggjarlóginni.

4. stk. Landsstýrið ásetir viðtøkurnar fyri grunnin.

beløb svarende til 5% af samtlige tilskudsberettigede udgifter til godkendt fritidsundervisning m.v. efter denne lovs kapitel 2—4. Det tilskrevne beløb afholdes med 50% af kommunerne og 50% af landskassen. Kommunernes andel fordeles med halvdelen efter indbyggerantal og halvdelen efter skatteindtægter.

Stk. 3. I fonden indgår tillige renter og afdrag på de af fonden ydede lån samt de særlige på finansloven fastsatte årlige bevillinger.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter vedtægterne for fonden.

9. TÁTTUR

Ásetanir um, nær lógin fær gildi v.m.

§ *24.* Henda lóg fær gildi 1. august 1982.

2. stk. Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstuðning til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935, fer samstundis úr gildi.

KAPITEL 9

Ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.

§ *24.* Denne lov træder i kraft 1. august 1982.

Stk. 2. Bekendtgørelse nr. 9 af 22. januar 1931 om tilskud fra staten til ungdoms- og aftenskoler på Færøerne, jfr. bekendtgørelse nr. 276 af 7. oktober 1935, ophæves samtidig.

Viðmerkingar:

Tær reglur, sum eru galdandi fyri fritíðarundirvising (kvøldskúlan) eru frá 1931 og 1935 og hava leingi verið ótíðarbóskandi. Spurningurin um at nútímansgera lóggávuna á hesum øki hevur fleiri ferðir verið viðgjørdur á tingi, men hevur ikki vunnið frama.

Í 1972 setti landsstýrið eftir áheitan frá Føroya Skúlastjórn ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina nýggja fritíðarlóggávu.

Arbeiðsbólkurin handaði í 1975 landsstýrinum eitt uppskot til »Lov for Færøerne om fritidsundervisning m.v.«

Aftaná at løgtingslóg um skúlafyrisiting var samtykt á heysti 1978, broytti arbeiðsbólkurin uppskotið og handaði tann 14. apríl 1979 landsstýrinum álit í málinum (sí skjal 1).

Uppskotið til løgtingslóg er gjørt við heimild í »lov for Færøerne om fritidsundervsning m.v.«, tí sonevndu rammulógini (sí skjal 2), og eftir § 9 í hesi lóg er tað heimastýrið, ið ásetir nærri reglur um fritiðarundirvising v.m.

Løgtingslógaruppskotið fevnir um tey trý sløgini av fritiðarundirvising og -virksemi, sum eru umrødd í rammulógini.

Tann almenna fritiðarundirvísingin (2. táttur í løgtingslógaruppskotinum) svarar til ta vanligu kvøldskúlaundirvisingina, soleiðis sum vit kenna hana í dag.

Tann serstaka fritiðarundirvísingin (3. táttur) fevnir um royndarfyrircikandi undirvising í serstøkum lærugreinum v.m., yrkiskenda undirvising og serundirvising. Slíka fritiðarundirvising hevur bert lítil møguleiki verið fyri at veitt eftir galdandi reglum. Tey seinastu árini hava myndugleikarnir tí í ein vissan mun tulkað galdandi reglur soleiðis, at tað hevur verið gjørt møguligt fyri kvøldskúlan at givið undirvising, ið miðaði ímóti góðkendari roynd. Í slíkum førum eru næmingarnir farnir upp til prógtøku sum privatistar á skúla ella stovni, sum hevur rætt til at halda prógtøkur, samanber nevndarálit síðu 11.

Fritiðarvirksemi fyri ung (4. táttur) er nakað nýtt. Tað skal tó viðmerkjast, at markið millum almenna fritiðarundirvísing og fritiðarvirksemi í sumum førum er ringt at seta, og hava myndugleikarnir tí í ein vissan mun góðkent undirvising eftir teimum galdandi reglunum fyri kvøldskúlan, sum, um reglurnar í hesum løgtingslógaruppskoti høvdu verið galdandi, hevði verið mett sum fritiðarvirksemi.

Eins og fólkaskúlalógin skal lógaruppskotið um fritiðarundirvising v.m. í stóran mun verða fylt út við almennum fyriskipanum gjørdar av landsstýrinum ella Landsskúlaráðnum.

Løgtingslógaruppskotið gevur ta formligu heimildina at leggja allar møguleikarnar fyri fritiðarundirvising og -virksemi undir løgtingslógina, men spurningurin um, hvat til eina og hvørja tíð verður tikið við, verður partvís avgjørdur av teimum árligu játtanunum á løgtingsfíggjarlógini, partvís teimum einstøku kommununum.

Í skjali 3 er gjørt eitt yvirlit yvir *lærugreinir/evni í kvøldskúlanum undir núverandi skipan*. Ein gjøgnumgongd av lærugreinum/evnum, ið hava verið góðkend í kvøldskúlanum tey seinastu 10 árini, vísir, at vaksið er um skeiðstilboðini í stóran mun. Tað er lagdur størri dentur á tey bókligu fakini, eins og tey »musiskø« fakini fevna um eitt størri øki.

Eisini er ein broyting farin fram í býtinum av monnum og kvinnum, ið luttaka í fritiðarundirvising, smb. álitið s. 12.

Hvat viðvíkur serstakari fritiðarundirvísing eftir 3. tátti í lógaruppskotinum kann væntast, at vavið av hesi undirvísing fer at vaksa soleiðis, at undirvisingin í framtíðini fer at fevna um fleiri lærugreinir/evni, enn hvat higartil hevur kunnað verið góðkent eftir kvøldskúlaskipanini.

Viðvíkjandi fritiðarvirksemi verður vist til síðu 15 í álitinum.

Tað er Landsskúlafyrisitingin, ið eigur at ansa eftir, at játtanir á fíggjarløgtingslógini verða hildnar. Soleiðis er tað fíggjarløgtingslógin, sum kemur at seta hægsta mark fyri vavinum á stuðulsheimilaðari fritiðarundirvísing ár undan ári.

Tær einstøku kommununrnar hava møguleika innan fyri ásetingarnar í lógini sjálvar at avgera, hvussu nógv tilboð tær vilja geva ibúgvunum í kommununi um fritíðarundirvísing v.m. Tær einstøku kommununrnar skulu tó eftir ásetingum í rammulógini koma við einum fjølbroyttum tilboði, ið er rimiligt eftir viðurskiftunum.

Lógaruppskotið hevur *tvey týdningarmikil endamál*. Annað er tað undirvísingarliga, hitt tað sosiala.

Tað undirvísingarliga endamálið er, at fritíðarundirvísingin, tann almenna eins og tann serstaka, skal nøkta ein part av tørvinum fyri undirvísing hjá ibúgvunum í kommununi, ein tørv, tey kanska ikki hava havt møguleikar fyri at fingið nøktaðan frammanundan.

Ein annar týðandi undirvísingarligur táttur er samarbeiði við fólkaskúlan. Við at kanna § 3 í fólkaskúlalógini sæst, at møguleiki er fyri, at fólkaskúlanæmingar kunnu fáa ein part av undirvísing teirra m.a. sum fritíðarundirvísing, av tí at hetta kann vera tann einasti møguleiki fyri at skipa bólkar, sum hava eina rímiliga stødd. Um hesin møguleikin ikki fansi, høvdu hvørki fólkaskúlanæmingar ella tey, sum ynsktu hesa undirvísing sum fritíðarundirvísing, havt høvi at fingið undirvísing orsakað av ov lítlari luttøku frá báðum pørtum.

Harumframt hevur fritíðarundirvísingin v.m. eisini *stóran sosialan týdning*. Hetta er serstakliga galdandi fyri partar av tí serstøku undirvísingini, men gevur fritíðarundirvísing v.m. sum heild eisini fólki møguleika fyri at koma saman, eitt møguleika, sum kanska nógv av teimum annars ikki høvdu havt.

Hvat viðvíkur fritíðarvirksemi, so gjalda í dag verandi feløg eina stóra upphædd til hetta virksemi fyri børn og ung, og lata landskassin og kommununrnar munandi stuðul til virksemi hjá hesum feløgum.

Hetta er tó ikki nóg mikið. Teir møguleikar, sum eru, eiga at verða útbygdir, og nýggir møguleikar eiga at verða stuðlaðir, so at ungdómurin kann fáa fjølbroyttar møguleikar fyri fritíðarvirksemi.

Sum áður sagt, er hesin partur av lógaruppskotinum heilt nýggjur, og er tað tí tor fört at meta um útreiðslurnar. Nevndin hevur í álitinum á síðu 27 mett útreiðslurnar til fritíðarvirksemi til 2,5 mió. kr.

Viðmerkjast kann, at henda meting er grundað á eitt tímatal uppá 50.000 um árið, og má hetta metast at vera høgt sett.

Av tí at virksemið eftir 4. tátti er so fjølbroytt, hevur landsstýrið broytt § 20 í løgtingslógaruppskotinum í álitinum soleiðis, at stuðul til hetta virksemi kann latast við í mesta lagi 50% av kostnaðinum.

Sum tað framgongur av nevndarálitinum síðu 19, so hugsar nevndin sær, at við luttøku í almennari fritíðarundirvísing verður goldið eitt hægri gjald av luttakarunum enn higartil. Tó skal viðmerkjast, at fleiri kommunur í skúlaárinum 1981/82 hava hækkað luttakaragjaldið so mikið, at tað fyri summar greinir er hægri enn hvat nevndin hevur hugsað sær.

Sambært løgtingslógaruppskotinum hevur kommunan skyldu til at seta serstaka fritíðarundirvísing á stovn, men Landsskúlaráðið kann áseta, at kommunan fyrst

skyldur sínar á annan hátt, samanber s. 15 í álitinum. Allar útreiðslurnar til hesa fritíðarundirvísing verða endurgoldnar úr landskassanum.

Eftir § 23 í uppskotinum verður ein grunnur settur á stovn. Grunninum verður árliga veitt 5% av øllum studningsheimilaðum útreiðslum til góðkenda fritíðarundirvísing v.m. eftir 2.—4. tátti í hesi lóg.

Av tí veittu upphæddini verða 50% rindað av kommununi og 50% úr landskassanum, sí álitið síðu 21. Fæ grunnsins kann m.a. nýtast til studning til kommunur, ið eru illa fyri, til skeið fyri lærarar og leiðarar, til landsumfatandi fritíðarundirvísing og til lán og/ella studning til bygging av t.d. ungdómshúsum.

Tað er torført at meta um figgjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum, men verður vist til síðurnar 29-32 í álitinum. Samandrátturin á síðu 29-30 eigur orsakað av teim hækkaðu lønunum at verða hækkaður við umf. 30%.

Í inniverandi fíggjarári er samlaði kostnaðurin av fritíðarundirvísingini mettur til at verða 4.600.000 kr. Herav er landskassans partur 1.072.000 kr.

Í skúlaárinum 1980/81 fevndi kvøldskúlaundirvísingin um 39.000 tímar. Um løgtingslógaruppskotið hevði verið lóg, høvdu 27.000 tímar verði lisnir sum almenn fritíðarundirvísing, 4.000 tímar sum serstøk fritíðarundirvísing, og 8.000 tímar høvdu komið undir fritíðarvirksemi. Samlaðu útreiðslurnar av kvøldskúlaundirvísingini í 1980/81 vóru umleið 4,3 mió. kr., hurav landskassans partur var umleið 1,0 mió. kr.

Landsstýrið hevur sent Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommunu uppskotið til løgtingslóg um fritíðarundirvísing til ummælis. Hesi hava svarað aftur ávikavist 12. og 15. mars 1982, jbr. viðløgdu skjøl 4 og 5. Stundir hava ikki verið hjá landsstýrinum at umbugsa hesi ummæli, men verður mælt til, at landsstýrið fær høvi til at viðgera ummælini saman við tí løgtingsnevnd, ið fær málið til ummælis.

Sí skjøl 19 A-E.

1. viðgerð 1. apríl. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 1. apríl 1982 beint í skúlanevndina.

Skúlanevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minnilutu.

Meirilutin (Óli Breckmann, Ivan Johannesen, Guttorm Klein og Finnbogi Isaksen) *mælir til, at skúlanevndin verður gjørd til millumtinganevnd,* so at Føroya Kommunufelag og Tórshavnar kommuna eftir umbøn fáa høvi til at seta fram síni sjónarmið í málinum. Nevndin fer síðani at kunna leggja fram álit sitt í ólavsøkutingsetuni.

Minnilutin (Jóannes Dalsgaard) mælir til, at málið verður avgreitt í hesi tingsetu.

28. apríl samtykt, at skúlanevndin verður miðlimtinganevnd hesum máli viðvíkjandi, við 26-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 2116-8.

---

164. Broyting í serliga innflutningsgjaldinum.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broyting í reglunum um serligt innflutningsgjald.

§ *1.* Í § 2 í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald verður sett sum punkt 16:
Hýru- og skúlavognar.

§ *2.* Tær í løgtingslóg nr. 64 frá 23. august 1974 galdandi reglur um lækking av innflutningsgjaldinum orsakað av skipan av samhandlinum millum Føroyar og Felagsmarknaðin umfata eisini hesa lóg.

§ *3.* Henda lóg fær gildi beinanvegin.

FORSLAG
til

Lagtingslov om ændring i reglerne om særlig indførselsafgift.

§ *1.* I § 2 i lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om særlig indførselsafgift indsættes som punkt 16:

Hyre- og køreskolevogne.

§ 2. De i lagtingslov nr. 64 af 23. august 1974 gældende regler om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet omfatter også denne lov.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Aksturvinnufelagið Samfylking hevur heitt á landsstýrið um at lætta um tollin á hýruvognum.

Felagið er av teirri áskoðan, at skipanin, við at sami tollur skal gjaldast fyri hýruvognar sum fyri privatvognar við afturrindan av muninum ímillum privatvognstollin og hýruvognstollin yvir 2 ára skeið, I ferð árliga, roynist ikki væl.

Samráðingar hava verið við umboð fyri Samfylking, og hevur felagið m.a. lagt fram roknskapartilfar, ið visir, at úrtøkan í hesi vinnugrein er lítil.

Tá avvarðandi reglur vóru broyttar í løgtingslóg frá 1972, var roknskapartilfar gjølliga kannað og hevði sín týdning í málinum.

Spurningurin um ítøkiligar reglur at lætta um vinnuúrtøkuna í hesum stætti eru ikki lættar at seta upp, men tá fært er fram frá umboðum fyri Samfylking, at talan er um hýruvogn sum »vinnutól« at sammeta, við t.d. maskinur til iðnað ella handverk, so er tað beint, at talan er um eina tænastu- ella servicefremleiðslu, ið krevur eina íløgu, ið skal forrentast og geva ein vinning, eisini til arbeiðsløn.

Um hetta sjónarmið kann góðtakast at eiga at gulda eisini fyri hýruvognar, kann undantaksregla fyri hýruvognar og skúlavognar setast í § 2 í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald.

Á løgtingi er í løtuni til viðgerðar løgtingsmál nr. 105/1981: Løgtingslóg um hýruvogaskoyring.

Um hetta uppskot til lóg verður samtykt, er landsstýrið sinnað til at endurskoða alt málið um tolling av hýru- og skúlavognum.

1. viðgerð 31. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð tann 31. mars 1981 beint í figgjarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 19. apríl. § 1 samtykt við 26-0, § 2 við 27-0 og § 3 uttan atkvøðu greiðslu.

3. viðgerð 21. apríl. Uppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.421-1-6. Lóg nr. 63 frá 6. mai 1982.

---

165. Løgtingslóg um lán til Telefonverk Føroya Løgtings.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars legði Páll Vang, landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um lán til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ *1.* Telefonverk Føroya Løgtings verður heimilað at læna upp til 30 mió. kr. ella at læna í fremmandum gjaldoyra upphædd, ið er 10 mió. hfl.

§ *2.* Landsstýrið fær heimild til at veðhalda landskassans vegna fyri tí í § 1 nevnda láni.

§ *3.* Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til Telefonverk Føroya Lagtings.

§ *1.* Telefonverk Føroya Løgtings bemyndiges til at optage lån på op til 30 mio. kr. eller at låne i fremmed valuta et beløb, der svarer til 10 mio. hfl.

§ *2.* Landsstyret bemyndiges til at garantere landskassens vegne for det i § 1 nævnte lån.

§ *3.* Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Grundgevingin fyri hesi lántøku eru figgjarviðurskifti telefonverksins. So at siga øll lán telefonverksins eru í fremmandum gjaldoyra. Tann stóra hækkingin av bæði rentu og serliga dollarvirði saman við, at danska krónan er devaluerað við umleið 6% um árið seinnu árini, hevur ávirkað skuld telefonverksins, soleiðis at roknast má við einum kurstapi uppá umleið 51 mió. kr. av núverandi restskuld. Grannskoðari telefonverksins hevur gjørt nágreinitligar metingar av figgjarviðurskiftunum, og er niðurstøðan, at um javnvág skal fáast figgjarliga, so er neyðugt við hesi lántøku,

eins og tað er neyðugt við eini taksthækking. Við seinastu taksthækking, ið varð lýst 21. december 1979, og við eini hækking nú uppá 23%, hevði taksthækkingin í meðal síðan 1. apríl 1975 verið 5,8% um árið, meðan allur kostnaður er vaksin við 12-15% árliga. Í samband við uppskotið til takstbroytingar verða útrokningar og frágreiðing grannskoðarans handaðar landsstýri og figgjarnevnd.

1. viðgerð 1. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 23. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. mars 1982 og undir 1. viðgerð 1. apríl beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Sólbjørn Jacobsen, telefonverkstjóra tann 21. apríl.

Ein samd figgjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Sverre Midjord, løgtingsmaður legði fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 3 verður orðað soleiðis:
»§ *3*. Fólka-, avtamis- og einkjupensjónistar, ið eru telefonfelagar, eiga ikki at gjalda innleggingar- og fast telefongjald, tó er hetta bert galdandi í ti føri, har viðkomandi pensjónistar hava egið húsarhald.«

§ 3 verður § 4.

2. viðgerð 23. apríl. Broytingaruppskot frá Sverra Midjord fall við 15-0. Landsstýrisins uppskot § 1 samtykt við 28-1, § 2 samtykt við 27-1.

3. viðgerð 23. apríl. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F.1..j.nr.1900-3-13. Lóg nr. 52 frá 6. mai 1982.

166. Fyrispurningur til Tórbjørn Poulsen, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð boðað frá fyrispurningunum frá Sverra Midjord, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Í tollløg fyri Føroyar stendur skrivað á síðu 14, § 3, stk. H:

»Av byggitilfari, inventar o.a. til skúlar, sjúkrahús, kirkjur v.m. kann landsstýrið veita gjaldfrían innflutning.«

Viðmerkingar:

Tað er eingin loyna, at tær flestu kommunur í Føroyum tey seinastu árini hava bygt og koma at byggja skúlar, og ta krøvini til skúlaskapin vaksa, eru krøvini til skúlabygningarnar størri enn tey vóru fyri bert nøkrum árum síðani.

Størri høli verða kravd nú, høli til serundirvísing, og flestu skúlarnir hava bygt fimleikarhøll teirra soleiðis, at hon hevur ítróttarhallarmál. T.v.s. kann brúkast aftaná skúlatíð, til nógv iriv ungdóminum at frama.

Tilfar til byggingar verður roknað við avgjaldi 25%, inventar verður roknað við 42% tollgjald. Tilfarið og inventarið verður fyri tað mesta keypt frá ti lokala timbur- ella møblahandli.

Ti skal spurningur mín verða til landsstýrismannin.

Hvussu skulu kommununrnar bera seg at við at fáa endurgoldið tollin av byggitilfari og inventari til teir í lógini lýstu bygningar.

22. mars varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

SVAR

Í løgtingsmáli nr. 166/1981 endurgevur Sverre Midjord, løgtingsmaður løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m. § 3, stk. h, har sagt verður: »At landsstýrið verður heimilað til at veita gjaldfrían innflutning við eftirliti av byggitilfari, inventar o.t. til skúlar, kirkjur, sjúkralús o.t.«

Sverre Midjord, løgtingsmaður spyr, hvussu kommununrnar skulu bera seg at við at fáa tollin av byggitilfari og inventari endurgoldnan til teir í lógini lýstu bygningar.

§ 3, stk. h, er komið inn í tolllógina við løgtingslóg nr. 10 frá 22. apríl 1960, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld o.a., við seinni broytingum.

Saubært løgtingstíðindi frá 1959, bls. 216, er grundin til, at stk. h kom í tolllógina tann, at farast skuldi undir at byggja statssjúkrahúsið í Tórshavn. Ríkismyndugleikarnir, sum skuldu gjalda allan byggikostnaðin, hildu tað ikki vera rímiligt, at teir harumframt skuldu gjalda toll.

Henda heimild landsstýrisins at veita gjaldfrían innflutning hevur verið praktiserað soleiðis, tá talan hevur verið um skúlar, kirkjur v.m., at veittur hevur verið tolllætti svarandi til helmingin av innflutningsgjaldinum og bert av inventari, ikki av byggitilfari.

Síðani § 3, stk. h varð sett í tolllógina, er komin løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinni broytingum um serligt innflutningsgjald. Hetta var upprunaliga 4% og er nú 20%.

Harumframt er komin løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinnu broytingum um eykainnflutningsgjald. Hetta var upprunaliga 2% og er nú 5%.

Landsstýrið hevur ikki heimild at gera undantak í serliga innflutningsgjaldinum og eykainnflutningsgjaldinum, og endurgjaldið svarandi til helmingin av innflutningsgjaldinum er sostatt ein væl minni partur av samlaða avgjaldinum enn hann var, tá § 3, stk. h kom í gildi í 1960.

Kommunur eins og onnur, ið ynskja tollætta sambært áðurnevndu heimild í tolllógini, skulu søkja landsstýrið um hetta í hvørjum einstøkum føri.

F.L.j.nr.403-6-27.

---

167. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann.

Ár 1982, friggjadagin 19. mars varð boðað frá fyrispurninginum frá Karin Kjølbro, tinglimi, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Hevur landsstýrið tikið nakra avgerð um, hvussu framtíðin skal laga seg hjá Fiski- og handsverksskúlanum á Sandi?

Viðmerkingar:

Lista- og Handverksskúlin á Sandi hevur skjótt 3 ár á baki. Tá hann byrjaði, varð játtað 1 ár sum royndarár, og síðani var hetta árið longt við einum ári aftrat.

Á hvørjum ári hava fyristøðukvinnan eins og næmingarnir verið í iva um, antin skúlin kom at halda fram næsta ár. Soleiðis var eisini í fjør, og eftir ti, ið frættist, veit eingin, hvussu viðurskiftini verða næsta ár.

Hetta er til miklan ampa bæði fyri lærarar og næmingar, og beinleiðis ein forðing fyri at tilrættisleggja eitt møguligt komandi skúlaár á skynsaman hátt.

Tá skúlin kom í síni tíð, vóru mong, ið fingu bjartar vónir — ikki minst føroysk kvinnurnar — um endurnýggjan av heimaídnaði og framburði innan føroyskan landbúnað.

Sum er kann skúlin bert taka í móti heilt fáum næmingum, men eftir ti, ið t.d. kom fram á seinastu ídnaðarviku, so eru møguleikarnir stórir, um bert stuðul fæst til endamálið. Næmingatalið kundi verið munandi størri eins og fleiri enn óroyndir útbúgvingarmøguleikar liggja á hesum skúla.

T.d. er komið fram, at nú er eftirspurningur til hindurs fyri komandi skúlaár at útbúgva leirvøruhandverkarar (keramikarar) á hesum skúla. Talan er sjálvandi um at arbeiða við føroyskari rávøru bæði, tá talan er um leirvørur og aðra gagnslisti.

Lista- og Handverkaraskúlin hevur ikki minst týdning sum bygdamenningarmál, eins og skúlin er við til at fjøltátta útbúgvingar- og arbeiðsmøguleikarnar hjá ungfólk okkara, ið sum kunnugt er verri fyri í dag enn, tá skúlin byrjaði fyri 3 árum síðani.

22. mars varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

30. mars svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Fyrispurningurin var soljóðandi:

»Hevur landsstýrið tikið avgerð um, hvussu framtíðin skal laga seg hjá Lista- og Handverkaskúlanum á Sandi!«

Lista- og Handverkaskúlin á Sandi fekk í 1979 loyvi til sum eina 8-mánaða royndarætlan undir kvøldskúlaskipanini at undirvísa 5 næmingum innan tekstil-umráðið í skúlaárinum 1979/80.

Loyvi er givið til framhaldandi undirvísing, eisini í skúlaárinum 1980/81 og í 1981/82 eftir tilmæli frá Landsskúlafyrisitingini.

Figgingin til neyðugar íløgur og rakstur er fingin til vega m.a. við stuðli frá menningargrunninum og búagrunninum.

Landsstýrið ásannar tann týdningin, ið ein slík útbúgving kann fáa bæði fyri heimavirki og fyri einum møguligum tekstilidnaði, og tað er neyvan nakar ivi um, at

ið hvussu so er ein dygdargóð grundútbúgving á hesum øki eigur at kunna verða givin her á landi.

Í sambandi við, at hetta landsstýrið í fjør vár skuldi taka støðu til eitt nýtt triðja royndarár, var landsskúlafyrisitingin biðin um at seta eina nevnd, ið skuldi hava til uppgávu at fáa tilvega eitt grundarlag undir støðutøku til framtíð skúlans. Arbeiðssetningurin, sum nevndin fekk at virka út frá, er lagdur hjá hesum svari sum skjal.

Landsstýrið hevur ikki enn tikið nakra avgerð um, hvussu framtíðin skal laga seg hjá Lista- og Handverkaskúlanum, men tá ið álitið frá nevndini fyriliggur, verður tað væntandi eitt nóg forsvarligt grundarlag til at taka støðu út frá.

Lista- og Handverkaskúlin á Sandi hevur nú í tvey ár verið rikin sum royndarskeið — skúlaárini 1979/1980 og 1980/1981. Fyri at fáa grundarlag undir støðutakan til framtíð skúlans fer Landsskúlafyrisitingin hervið at heita á tygum um saman við

at gerast limur í nevnd, sum skal geva Landsskúlafyrisitingini álit skúlanum viðvíkjandi.

Setningurin er hesin:

1. At kanna virksemi skúlans tey bæði árini, hann hevur virkað undir royndarskipan — og geva Landsskúlafyrisitingini meting (rapport) hesum viðvíkjandi.

2. At kanna tørvin á Lista- og handverkaskúla í Føroyum og geva Landsskúlafyrisitingini generella meting um hetta.

3. At meta — og geva Landsskúlafyrisitingini tilráðing — um, hvar í landinum ein lista- og handverkaskúli kann liggja (hvar eru bestu fortreytirnar til staðar fyri slíkum skúla?)

4. At meta um, á hvønn hátt ein lista- og handverkaskúli best kann rekast (sum sjálvstøðugur stovnur ella saman við øðrum yrkisskúla):

5. At taka støðu til, hvørji fak/lærugreinir skúlin skal geva undirvísing í — og hvussu undirvísingin skal skipast (herundir lutfallið millum teoretiskar og praktiskar lærugreinir).

6. At vísa á, hvørja útbúgving lærarafólk á slíkum skúla skulu hava. Í hvussu stóran mun hevur skúlin brúk fyri fólki við serútbúgving — og hvørji lærarafólk kann hann hava felags við aðrar skúlaformar? Spurningin um tørvin á gestalærarum kann eisini nemast við í hesum sambandi.

7. At meta um útreiðslurnar til høli, amboð og ymiskt undirvisingartilfar v.m. hjá einum lista- og handvekaskúla:
   a) um skúlin kemur at virka sum sjálvstøðugur slovnur.

   b) um skúlin verður rikin saman við øðrum vinnuskúla.

8. At greina út endamálið við einum lista- og handverkaskúla í Føroyum og definera skúlan. Herundir: 1) hvat skal slíkur skúli útbúgva næmingar sínar til? 2) hvussu nógv ár skal útbúgvingin fevna um? 3) hvønn førleika skulu næmingarnir hava, tá skúlagongd teirra er liðug — hvussu kunnu teir t.d. brúkast a) í vinnulivinum, b) í egnum virki? 4) hvussu passar skúlin inn í føroysku undirvisingar og útbúgvingarskipanina? 5) hvørjar fortreytir skulu næmingarnir lúka fyri at koma inn á skúlan? 6) hvørja framhaldandi útbúgving kvalifiserar lokin skúlagongd á lista- og handverkaskúla næmingarnar til? (sbr. her eisini við pkt. 5).

9. Loksins at geva Landsskúlafyrisitingini samanfatandi meting um samfelagsliga týdningin av einum lista- og handverkaskúla.

Fyrsti fundurin hjá nevndini verður hildin í fundarhølinum hjá Landsskúlafyrisitingini í J. Broncksgøtu 27, Tórshavn, miðvikudagin tann 29. apríl 1981 kl. 14,00.

Nevndararbeiðið er ólønt. Ber tygum ikki til at gerast limur í nevndini, verða tygum biðin um at boða Landsskúlafyrisitingini (tlf. 1.4930 — 1.4931) frá hesum sum skjótast og í seinasta lagi mánadagin tann 27. apríl 1981.

F.L.j.nr. 2143-1.

---

168. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð boðað frá fyrispurningi frá Karini Kjølbro, tinglimi, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Kann landsstýrismaðurin geva løgtinginum eina frágreiðing um, hvussu gongst

við arbeiðinum at gera eina djóraverndarlóg, og hvørjar ætlanir landsstýrið hevur á hesum øki?

Viðmerkingar:

Í 7 ár hava vit havt eitt djóraverndarfelag, ið hevur roynt at virka uttan nakra løgtingslóg.

Hetta felag hevur hesi ár ferð eftir ferð vent sær til landsstýrið og andstøðu og biði um, at ein djóraverndarlóg verður gjørd.

Á sumri 1980 tók táverandi landsstýrið stig til at seta eina nevnd, ið skuldi gera uppskot um eina djóraverndarlóg.

Á seinasta aðalfundi djóraverndarfelagsins í apríl í fjør kom tó alment fram, at nevndarlimirnir umhugsaðu at taka stig til at avtaka felagið, tí eingin veruligur stuðul var at hóma frá politiskari síðu. Felagið helt kortini fram, og nú er so greitt, at uppskotið til djóraverndarlóg er gjørt og handað landsstýrinum.

Í dag er seinasti dagur at leggja fram uppskot fyri tingið í hesi tingsetu, og einki uppskot er komið um djóraverndarlóg.

Millum annað tí at umrødda felag eftir øllum at døma kemur at hava aðalfund áðrenn komandi tingsetu, hevur tað áhuga at frætta, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur hesum viðvikjandi.

Nógvar góðar grundir eru fyri at gera eina djóraverndarlóg. T.d. eru vit føroyingar fyri stórum atlinningum frá øðrum londum og felagsskapum vegna veiðu av stórhvali og grindahvali.

Hetta er valla til sóma fyri umdømi okkara uttanlands, men verri er, um tað eisini kemur fram, at vit als onga djóraverndarlóg hava, eins og hetta harmar nógvar landsmenn okkara.

22. mars varð við 30-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. apríl svaraði Páll Vang, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

3. juni 1980 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at koma við uppskoti um eina nýggja djóraverndarlóg.

Í bólkinum vóru landsdjóralæknin, eitt umboð fyri landsstýrið og eitt umboð fyri djóraverndarfelagið.

14. januar 1982 læt arbeiðsbólkurin landsstýrinum eitt uppskot, men kundi landsdjóralæknin ikki taka undir við hesum uppskoti, orsakað av, at ein djóraverndarlóg viðkemur og rakar stórar bólkar í samfelagnum, sum hava við dýr at gera. Tí mælti

hann til at seta eina nevnd við landfútanum, landsdjóralæknanum, hjálpardjóralæknanum, landbúnaðarráðgevaranum og einum skrivara frá umsitingini.

18. februar 1982 samtykti landsstýrið at ganga ynskjum landsdjóralæknans á møti, og er nevndi arbeiðsbólkur farin til arbeiðis.

Tá uppskot fyriliggur, vil landsstýrið senda tað til ummælis hjá eitt nú Føroya Búnaðarfelag, Bóndafelag Føroya, Føroya Riðingafelag, Djóraverndarfelagnum, seyðaráðgevaranum, sýslumonnunum, kommunufelagnum og møguliga øðrum áhugaðum og sakkønum.

F.L.j.nr. 1713-13-1.

---

169. Prístalsviðgerð av lærlingalønum.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at broyta lærlingalógina soleiðis, at lærlingalønirnar verða ásettar av yrkisfeløgunum ella viðkaða læruráðnum og at lærlingalønir verða prístalsviðgjørdar eftir løgtingslógini um prístalsviðgerð av arbeiðslønum.

Viðmerkingar:

Lærlingafelagið hevur heitt á landsstýrið um at fáa spurningin um fulla prístalsviðgerð av lærlingalønum loystan.

Málið um lærlingalønir hevur fleiri ferðir seinastu árini verið til viðgerðar í tinginum.

Eftir seinastu løgtingssamtyktini skuldi ein nevnd hjá landsskúlafyrisitingini, ið skuldi arbeiða við einum uppskoti til nýggja lærlingalóg, eisini taka hetda spurning við har, tá lærlingalønirnar eru ásettar í sjálvari løgtingslógini um lærlingaviðurskifti.

Frá nevndini hevur Lærlingafelagið fingið at vita, at nevndin ikki kann taka sær av øðrum spurningum enn sjálvari upplæringini og sostatt ikki av lønarspurninginum.

Tá freistin at leggja uppskot fram í hesi tingsetu er úti í dag, setur landsstýrið fram hetta uppskot og fær tingnevndin, ið fær málið til viðgerðar, tað neyðuga tilfarið frá landsstýrinum til viðgerð av málinum.

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í lóganevndina, sum 24. apríl legði fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er framlagt av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð beint í lóganevndina.

Málið um prístalsviðgerð av lærlingalønum hevur fleiri ferðir áður verið til viðgerðar í løgtinginum.

Málið varð lagt fram sama dag freistin at leggja uppskot fyri tingið í hesi setuni, var úti.

Tá málið krevur gjølla viðgerð og útvegan av tørvandi upplýsingum, sær nevndin seg ikki føra fyri at avgreiða málið í hesi tingsetuni.

Nevndin setir sostatt fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingsmál nr. 169/1981: Prístalsviðgerð av lærlingalønum verður útsett til ólavsøkutingsetuna.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

---

170. Fyrispurningur til løgmann.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð boðað frá fyrispurninginum frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

FYRISPURNINGUR

Vegna landsstýrið hevur løgmaður lagt uppskot fyri tingið, sum loyvir landsstýrinum at sela partapening í P/f Fisk, Hvalba.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur løgmaður m.a.:

»... Tá gongd kemur á framleiðsluna av svartkjafti til matna, kemur henda framleiðsla væntandi fyrst og fremst at fara fram á økinum Streymoyggin — Eysturoyggin — Klaksvík.«

Loyvi mær út frá hesum at spyrja løgmann:

1. Standa hesi orð fyri metingum ella ætlanum landsstýrisins?
2. Verða møguligar umsóknir um figgjan av svartkjaftavirkjum úr Vágum, Suðuroy ella Sandoy skúgvaðar til viks til fyrimuns fyri umsóknir úr Streymoy, Eysturoy ella Klaksvík.

22. mars varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

22. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Svend Åge Ellefsen, løgtingsmaður hevur 19. mars í ár sett mær hesar spurningar:

»Vegna landsstýrið hevur løgmaður lagt uppskot fyri tingið, sum loyvir landsstýrinum at seta partapening í P/f Fisk, Hvalba.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur løgmaður m.a.:

»... Tá gongd kemur á framleiðsluna av svartkjafti til matna, kemur henda framleiðsla væntandi fyrst og fremst at fara fram á økinum Streymoyggin — Eysturoyggin — Klaksvík.«

Loyvi mær út frá hesum at spyrja løgmann:

1. Standa hesi orð fyri metingum ella ætlanum landsstýrisins?
2. Verða møguligar umsóknir um figgjan av svartkjaftavirkjum úr Vágum, Suðuroy ella Sandoy skúgvaðar til viks til fyrimuns fyri umsóknir úr Streymoy, Eysturoy ella Klaksvík.«

Viðvíkjandi 1. spurninmgi.

Viðmerkjast kann, at landsstýrið ikki hevur nakra lidna meting um og ætlan fyri útbygging av svartkjaftaveiðu og -framleiðslu. Viðmerkjast kann eisini, at allar umsóknir um íløgur í svartkjaftaframleiðslu á landi og allar fyrireikingar til tílíkar íløgur landsstýrinum kunnugt viðvikja økinum Streymoyggin — Eysturoyggin — Klaksvík. Hesin veruleiki bendir saman við øðrum á, at orðingin nevnd omanfyri er á leið.

Viðvíkjandi 2. spurningi.

Tað átti at verið óneyðugt at sagt, at møgulígar umsóknir um liggjan av svartkjaftavirkjum í Vágum, Suðuroy ella Sandoy ikki verða skúgvaðar til viks.

171. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann.

Ár 1982, fríggjadagin 19. mars varð boðað frá fyrispurninginum frá løgtingsmonnunum Svend Åge Ellefsen og Anfinn Kallsberg, soljóðandi

FYRISPURNINGUR

1. Hvussu langt áleiðis er landsstýrið komið við ætlanunum um at seta á stovn helikoptaratænastu í Føroyum?

2. Kann roknast við helikoptaraflúgving í summar?

Viðmerkingar:

Á sumri 1981 leigaði landsstýrið helikoptara til royndarflúgvingar.

Henda flúgving fekk góða undirtøku frá búfólki á smáplássunum.

Vegna tørvandi undirtøku í figgjarnevndini noyddist landsstýrið at steðga flúgvingini í úrtið.

Síðan hevur ymist verið frammi um helikoptaraflúgving. M.a. hevur Framburðs og Fiskivinnuflokkurin lagt uppskot fram á tingborð um helikoptaragrunn.

Hetta uppskotið varð beint í figgjarnevndina, haðani tað enn ikki er afturkomið.

Tá tey, sum nyttuna skulu hava av hesi flúgving við ótolni bíða eftir hvat ið fer at henda, loyva vit okkum at seta fram hesar fyrispurningar.

22. mars varð við 29-1 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

29. mars svaraði Olaf Olsen, landsstýrismaður fyrispurninginum soleiðis

SVAR

Í fyrispurninginum verður spurt, hvussu langt áleiðis landsstýrið er komið við ætlanunum um at seta á stovn helikoptaratænastu, og um roknast kann við, at henda verður í summar.

Svarast kann stutt, at landsstýrið á fundi 26. mars í ár hevur samtykt at fara undir helikoptaratænastu í summar til tær avsíðis liggjandi bygdirnar.

F.I., j.nr. 1820-17-7-2.

172. Val av álitismonnum og nevndum.

Sí bls. 7

---

173. Stuðul til Hvannasunds, Leirvíkar, Kollafjarðar, Vestmanna og Sands kommunur í sambandi við bygging á havnarøki í avvarðandi kommunu.

Ár 1982, fríggjadagin 23. apríl legði vega- og havnanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Økini rundan um fiskavirkini í Norðdepli og Leirvík skulu regulerast og betong leggjast í tann mun, tað er kravt av myndugleikunum. Kostnaðurin verður mettur til ávikavist 1,0 mió. kr. og 400.000 kr.

Í Gøtu er ætlanin at fara undir smoltframleiðslu og verður neyðugt í hesum sambandi at økja nakað um havnarøki við Harenga. Kostnaðurin verður mettur til 300.000 kr.

Økið rundan um fiskavirkið Nykur var regulerað seinasta summar og kom kostnaðurin at verða nakað hægri enn játtaða studningsupphæddin. Ætlanin er at planera øki ímillum havnaøki í Oyrunum og ferjulegina og er kostnaðurin fyri hetta arbeiði og áðurnevndi meirkostnaður settur til 800.000 kr.

Á Eiði skal økið rundan um flakavirkið regulerast og betongleggjast í tann mun myndugleikarnir krevja tað. Kostnaðurin verður mettur til 700.000 kr.

Í Hvalvík er planeringsarbeiði við havnina í gongd og verður pláss til tvey virkir. Kostnaðurin verður mettur til 1,8 mió. kr.

Í Kollafirði er eitt minni øki fylt út til grundøki undir fóðurgoymslubygninginum hjá P/f Fóður. Kostnaðurin er o.u. 300.000 kr.

Inni á Fjørð í Vestmanna er ætlanin at fylla meira út fyri at økja um ídnaðarøki í bygdini. Kostnaðurin er mettur til 1,0 mió. kr.

Á Sandi er útbyggingin av fiskavirkinum um at verða liðug og verður rættuliga umfatandi reguleringsarbeiði at gera. Kostnaðurin verður mettur til 1,4 mió. kr.

Nevndin skal loyva sær at mæla tinginum til at ganga umsóknunum á møti og loyvir sær at seta fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um studning til Hvannasunds, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Eiðis, Hvalvíkar, Kollafjarðar, Vestmanna og Sands kommunur til ávís arbeiði í sambandi við bygging ella útbygging av ídnaðarvirki á havnarøki í avvarðandi kommunu.

§ *1.* Úr landskassanum verður veittur studningur til niðanfyri nevndu kommunur til at fylla út ella spreingja burtur fyri grundøki við avvarðandi havn og byggibúna tað, til at regulera og festa øki uttan um ídnaðarbyggingar, soleiðis at viðurskiftini lúka tey krøv, ið galda fyri avvarðandi virki og til onnur tiltøk í sambandi við nútímansgerð av ídnaðarvirki. Studningurin er 75% av byggipeningunum, tó í mesta lagi 75% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og verður hann goldin við eins stórum ársgjøldum í so nógv fylgjandi fíggjarár, sum niðanfyri tilskilað, frá og við fíggjarárinum 1982/83 at rokna:

lagtingslov om tilskud til Hvannasunds, Leirvikar, Gøtu, Nes, Eiðis, Hvalvikar, Kollafjarðar, Vestmanna og Sands kommuner til visse arbejder i forbindelse med etablering eller udbygning af industrivirksomhed på havneareal i vedkommende kommune.

§ *1.* Af landskassen ydes tilskud til nedennævnte kommuner til opfyldning eller udsprængning for grundareal ved vedkommende havn og til byggemodning af dette, til regulering og befæstelse af arealer uden om industribygninger, så forholdene opfylder de for vedkommende virksomhed gældende krav, samt, til andre foranstaltninger i forbindelse med modernisering af en industrivirksomhed. Tilskudet andrager 75% af anlægsudgifterne, dog højst 75% af nedenfor anførte beløb og udbetales med lige store årsrater i det nedenfor angivne antal på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1982/83 at regne:

Kommuna	áramál	kr.
Hvannasunds	2	1.000.000
Leirvíkar	1	400.000
Gøtu	1	300.000
Nes	2	800.000
Eiðis	2	700.000
Hvalvíkar	3	1.800.000
Kollafjarðar	1	300.000
Vestmanna	2	1.000.000
Sands	3	1.400.000
		7.700.000

Kommune	åremål	kr.
Hvannasunds	2	1.000.000
Leirvíkar	1	400.000
Gøtu	1	300.000
Nes	2	800.000
Eiðis	2	700.000
Hvalvíkar	3	1.800.000
Kollafjarðar	1	300.000
Vestmanna	2	1.000.000
Sands	3	1.400.000
		7.700.000

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

3. viðgerð 23. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum, n.

Lóg nr. 74 frá 21. mai 1982.

---

174. Broytingar í lóg um sjúkrahúsinnlegging av sinnissjúkum.

Ár 1982, hósdagin 1. apríl legði lóganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur tann 15. mars 1982 skrivað tinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at § 1 í lóg nr. 175 frá 11. juni 1954 og § 5 í lóg nr. 225 frá 7. juni 1972, báðar um broyting í lóg nr. 118 frá 13. apríl 1938 »om sindsyge personers hospitalsophold« verða kunngjørdar at galda í Føroyum.

Eftir fyrru lógarbroytingini verður sett beinleiðis í lógina, at fyrisitingarligar avgerðir um tvangsinnlegging av sinnissjúkum persónum altíð kunnu skjótast inn fyri rættin, sum grundlógin gevur rætt til. Eftir seinnu lógarbroytingini verður arbeiðsbýti býtt millum skiftirættin og magistratin í København og kunngerð av lógini í Føroyum kann hava týdning fyri tvangsinnlegging av persónum, heimahoyrandi í København, men sum eru staddir í Føroyum.

Viðlagt fylgja serprent av lógini.«

Málið varð beint í lóganevndina og setir ein samd lóganevnd fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

§ 1 í lóg nr. 175 frá 11. juni 1954 og § 5 í lóg nr. 225 frá 7. juni 1972, báðar um broytingar í lóg nr. 118 frá 13. apríl 1938 »om sindsyge personers hospitalsophold«, verða lýstar at galda í Føroyum.

2. viðgerð 16. apríl. Uppskotið varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.520-6.

---

175. Broyting í passlógini.

Ár 1982, hósdagin 1. apríl legði lóganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Landsstýrið hevur 10. mars 1982 skrivað tinginum soljóðandi:

»Ríkisumboðsmaðurin hevur í skrivi dagfest 1. mars 1982 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 176 frá 7. apríl 1976 um broyting í lógini um pass verður lýst at galda í Føroyum. Eftir galdandi lóg eru gjøldini fyri pass ásett í lógini. Eftir lógarbroytingini fær løgmálaráðið heimild at áseta gjøldini í kunngerð.

Viðlagt fylgja serprent í lógini og notat frá lógmálaráðnum um gjøld fyri pass í Føroyum.«

Málið varð beint í lóganevndina. Nevndin hevur viðgjørt málið, og setir ein meiri-

luti í nevndini (Guttorm Klein, Agnar Nielsen, Jona Henriksen og Edmund í Garði) fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Lóg nr. 176 frá 7. april 1976 »om ændring af lov om pas til danske statsborgere m.v.« verður lýst at galda í Føroyum.

Minnilutin (Petur Reinert) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 20. apríl. Uppskotið varð samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 509-1-9.

---

176. Stuðul til royndir við snarkøling av fiski.

Ár 1982, friggjadagin 23. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Løgtingið hevur fingið bræv dagfest 22. februar 1982 viðvíkjandi snarkøling av fiski frá John Smith. Brævið varð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur kannað tilfarið og hevur tann 23. mars havt fund við John Smith og við umboð fyri heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Nevndin er av teirri áskoðan, at spurningurin um góðskuna av tí ráfiski, sum verður latin føroysku flakavirkjunum, er av alstórum týdningi fyri landsins búskap. Tiltøk, ið kunnu samvirka til at bøta um góðskuna hava tí uppiborið stuðul. Nevndin hevur fingið ta uppfatan, at tær ætlanir, ið John Smith hevur, eru so mikið áhugaverdar, at royndir eiga at verða settar í verk, so greiða fæst á, um tær hugsanir

um snarkøling, ið John Smith hevur lagt fram, kunnu gjøgnumførast í praksis á ein slíkan hátt, at hetta førir til tey ynsktu úrslitini.

Nevndin mælir tí til, at løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at royndir verða settar í verk. Figgingini viðvíkjandi er at viðmerkja, at nevndin kann mæla til, at útreiðslurnar verða latnar av teirri upphædd undir § 16, Fiskivinna, sigling o.t., 2490, aðrir studningar, 3301 minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna, sum er at ráða yvir hjá landsstýrinum saman við løgtingsins figgjarnevnd.

Nevndin setir til fram fylgjandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at royndir viðvíkjandi snarkøling av fiski verða settar í verk.

2. viðgerð 24. apríl. Uppskotið frá nevndini samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L.j.nr.1539-5.

---

177. Vegir og lendingar.

Ár 1982, fríggjadagin 23. apríl legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt tær o.u. 170 umsóknirnar, sum innkomnar eru.

1. *Vegir.*

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av undir konto gr. 13.1.1. 62,3 mill. kr. til vegagerðir, umsitingina av landsvegunum o.a.

Viðvíkjandi nýtsluni av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram sotjóðandi

UPPSKOT

A. Til útbygging av og ábøtur á landsvegakervini og umsiting teirra; harumframt til brýr, bilferjur o.a.	49.323.098	kr.
Bundið í ikki nýttum játtanum o.u.	7.314.402	-
Til niðanfyri nevndu vegagerðir	5.662.500	-
	62.300.000	kr.

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
Svínoyar	Ábøtur á vegin um Eiðið	100.000
	Umvæling og ast. av bygdavegnum	100.000
	Dyrkingarveg í Handantúnstriðingi	50.000
Viðareiðis	Dalavegin (dyrkingarvegur)	75.000
	Dyrkingarveg inni í Dølum	75.000
Hvannasunds	Gerð av 500 m býlingavegi	150.000
Klaksvíkar	Dyrkingarveg niðan í Gravardal	100.000
	Veg í Árnafirði	50.000
Kunoyar	Veg í Haraldsundi	150.000
Mikladals	Ábøtur á verandi veg í Mikladali	100.000
Húsa	Vegagerð í Syðradali	100.000
Elduvíkar	Búsetingarveg í Elduvík	100.000
	Búsetingarveg í Funningsfirði	100.000
Fuglafjarðar	Vegagerð norður í Halgadal	50.000
	Vegagerð í Rossagerði	100.000
Leirvíkar	Nýgerð av bygdavegi	100.000
Gøtu	Dyrkingarveg norðuri millum Fjarða	100.000
	Íbinding í høvuðsvegin í Syðrugøtu	100.000
Runavíkar	Dyrkingarveg úti í Byrgi í Søldarfirði	100.000
	Veg til Glyvra kirkju	150.000
	Búnaðarveg í Søldarfirði	100.000
	Framhald av vegagerðini móti Glyvradali	75.000
Skála	Veg í miðbygdini	100.000
	Vegagerð í Skálafirði	100.000
		2.325.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		2.325.000
Sjóvar	Útstykkingarveg í Eyrgøtu	100.000
	Útstykkingarveg innan Glyvur	100.000
	Útstykkingarveg uppi á Fløtum	100.000
	Gerð av nýggjari brúgv um Blásenda norðanfyri Selatrað	100.000
Sunda	Útstykkingarveg á Oyrabakka	100.000
	Útstykkingarveg á Oyri	100.000
Eiði	Dyrkingar- og útstykkingarveg uppi á Kollshjøllum/Meinufløtu	100.000
	Dyrkingar- og útstykkingarveg Úti á Bø	100.000
Gjáar	Veg úr landsvegnum eystur á Fløtur	50.000
Funnings	Umvæling av brúgv og parkeringsøki	100.000
Haldórsvíkar	Útstykkingarveg í Vík	100.000
	Útstykkingarveg á Langasandi	100.000
Hvalvíkar	Útstykkingarveg í Hvalvík	50.000
	Útstykkingarveg í Streymnesi	50.000
Hósvíkar	Útstykkingarveg	100.000
Kollafjarðar	Útstykkingarveg í Útibø	100.000
Kvívíkar	Framhald av vegi fram í Gerði	50.000
	Veg á Stykkinum	50.000
	Leinging av ovara vegi í Leynum við síðuvegi	50.000
Vestmanna	Umbygging av vegnum frá Mørkini niðan á Heygar	100.000
Tórshavnar	Dyrkingarveg í Kaldbak	50.000
	Dyrkingarveg í Kaldbaksbotni (Andr. Pet.)	50.000
	Dyrkingarveg í Kaldbaksbotni (Petur Bær.)	50.000
Tórsh. Uttanb.	Dyrkingarvegin á Fløtum	50.000
	Dyrkingarvegin við Marknú	50.000
Kirkjubøar	Útstykkingarvegir (1 í Kirkjubø og 3 á Velbastað)	100.000
	Veg út á traðirnar úti á Heyggi	50.000
	Dyrkingarveg suður í Havnardal	75.000
	Dyrkingarveg út á Bø	50.000
Hests	Veg til kirkjugarðin í Hesti	100.000
		4.650.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		4.650.000
Sandavágs	Nýggjan veg úr Urnamørk yvir í Sjóvarbø	150.000
Miðvágs	Meirjáttan til veg á Tikarheyggi	100.000
	Meirjáttan til veg omanf. Kirkjar	100.000
	Nýjáttan til samanbinding millum landsvegin og Nesavegin	100.000
Sørvágs	Vegin gjøgnum Úttriðingsbøin (framh.)	100.000
	Vegin gjøgnum Suðurtriðingsbøin (framh.)	100.000
	Vegin uppi á Mýrum (framh.)	100.000
Biggjar	Veg í bygdini	100.000
Sands	Umlegging av vegnum til Traðir	100.000
	Ábøfur á Søltuvíksvegin	50.000
	Dyrkingarveg til Skálsá fjórðing	50.000
Skopunar	Veg oman í Byrgi í Skopun	100.000
Skálavíkar	Heimastahagavegin	100.000
Húsavíkar	Brúnna um Stóra	150.000
Hvalbiar	Dyrkingarveg eystur í eystasta bøin í Sandvík	100.000
Froðbiar	Útstykkingarveg í Trongisvági	100.000
	Útstykkingarveg í Froðbø	100.000
	Veg gjøgnum Heiðarnar í Froðba	100.000
Hovs	Dyrkingarveg	100.000
Porkeris	Gerð av vegi inni í Bø	100.000
	Dyrkingarvegin niðan í Dal	100.000
Vágs	Vegin til Fámará lidnan	200.000
Sunnbiar	Veg í uttara Bø í Lopra	100.000
	Útstykking í Sunnba	100.000
Nes	Veg úti á Nesi, niðanfyri landsvegin	100.000
	Veg millum Nes og Toftir	100.000
	Veg inn í Saltnes	100.000
	Veg í Lágabø á Toftum	100.000
		7.550.000
		= 5.662.500

II.
Lendingar:

Játtanir fyri fíggjarárið 1982/83, sum samtyktar eru áður eru hesar:

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
Fugloyar	Ábøtur á lendingina við Trøllagjógv (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	50.000
Viðareiðis	Trygging av bakkanum (vegin til Fiðsvík) (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	80.000
Hvannasunds	Bátahavn n.f. byrgingina, leinging av bryggjuni við flakav. í Norðdepli og gerð av havnarøki Hvannasundsmegin (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag) (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	400.000
Klaksvíkar	Bátahavn á Borðoyarvík (5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	200.000
	Trygging av kistunum í pierinum í Klaksvíkini (3. ársgjald av 3 ára játtan ikki bygt	200.000
	2. byggistig í dekksbátahavnini í Árnafirði og regulering av betonlegging við flakavirkið á Kósini (3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	400.000
Kunoyar	Lendingarvegin (2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	100.000
Elduvíkar	Bátahyl í Funningsfirði (2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	200.000
	Bátahyl í Funningsfirði (2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	150.000
Oyndarfjarðar	Veg o.a. í sambandi við dekksbátahavn í Oyndarfirði (3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	400.000
	Dekksbátahavn (2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	800.000
Fuglafjarðar	Dekksbátahavn (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
		3.280.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		3.280.000
Gøtu	Veg á og regulering av havnarplássi í Norðagøtu	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	150.000
	Dýping, reguleringsarbeiði og el-arbeiði	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	500.000
Runavíkar	Bryggju í Søldarfirði	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	300.000
	Havnarlagið á Bakka á Glyvrum	
	(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	200.000
	50 m atløgubryggju í Søldarfirði	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Ábøtur og víðkan av oljubryggjuni í Søldarfirði	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	150.000
Nes	Omankoyring til lendibr. við Toftagjógv og parkeringspláss	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	100.000
	Grótkast s.f. ferjuleguna á Toftum	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	400.000
Sjóar	Byggiøki, ferjulega o.a. við Heyggsstøð	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	600.000
Sunda	Dekksbátahavn við Norðskála	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	120.000
	Bátahyl á Oyrabakka	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	225.000
	Planerjng fyri nýggjum skeljavirki	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	100.000
Eiðis	Byggiøki við havnina o.a.	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	800.000
	Bátahavn	
	(2. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	800.000
Haldórsvíkar	Bátahyl í Haldórsvík	
	(6. ársgjald uv 6 ára játtan) í gerð	100.000
Hvalvíkar	Atløgusíða í dekksbátahavnini	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	100.000
	Veg til ídnaðarøki s.f. havnina í Hvalvík	
		8.225.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		8.225.000
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	100.000
	Verjugarð o.a. við dekksbátahavnina (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	100.000
Kvívíkar	Ábøtur á bátahavnina í Kvívík og til bátahyl á Válinum (5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	200.000
Vestmanna	Bátalegur innanfyri Grønanes og monteringsbryggju við Skipasmiðjuna (3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	600.000
Tórshavnar uttanb.	Bátahavn á Argjum (3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	600.000
Kirkjubøar	Lendingina á Velbastað (2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000
Hests	Dekksbátahavn í Hesti (3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	800.000
	Lendingina í Koltri (2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
Nólsoyar	Bryggju v.m. (5. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	300.000
	50 m atløgusíða (3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	400.000
Sandavágs	Bátahyl, cykajáttan og ábøtur á innsiðuna (5. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	100.000
	Veg oman á havnarøki á Giljanesi og portur á hylin (5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	300.000
	Veg oman á havnarøki við Giljanes (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	150.000
Miðvágs	Veg út til brimgarðin á Prestlandinum (4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	250.000
	Brimgarð á Prestlandinum (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	600.000
	Bátahylin og veg á Prestlandinum (2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	175.000
Sørvágs	Atløguplass í bátahavnini	
		13.100.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		13.100.000
	(3. ársgjald av 5 áru játtan) ikki bygt	150.000
Sands	Bátabryggju í havnini	
	(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	150.000
	Regulering av øki í sambandi við fiskiídnaðarbygging og onnur arbeiði við havnarlagið á Sandi	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	600.000
	Havnaviðkanina	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	300.000
Skúvoyar	Veg niðan frá lendingini	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	225.000
	Vegin frá lendingini upp á bakkan	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	200.000
Hvalbiar	Eykajáttan til bátahavn o.a. í Nesi	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	250.000
	Arbeiði í sambandi við fiskiídnaðarbygging við Hamrancs	
	(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	600.000
	Skipahavnina á Hamranesi	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
	Træbryggja í Nesi	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	150.000
	Lendingina við Neyst	
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	75.000
Tvøroyrar	Bátahyl á Tvøroyri	
	Bátahyl á Tvøroyri	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	150.000
Fámjins	Lendingina	
	(2. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	100.000
Vágs	Bátahyl	
	(4. ársgjald av 4 ára játtan) lutvíst bygt	250.000
	Bátahyl	
	(1. ársgjald av 3 ára játtan) lutvíst bygt	200.000
Sunnbiar	Dráttin í Pollinum	
	(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	100.000
		16.700.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		16.700.000
Tórshavnar	Bátastøð við Biggjarstøð í Kaldbak (2. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð	100.000
	Tilsamans 3/4 av 16.800.000	
	=	12.600.000

Játtað frammanundan fyri 1982/83 til lendingar		12.600.000
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31.03.1982:		
Av vanligum lendingajáttanum		19.033.221
Av 5 ára ætlanini til smærri havnir		134.575
		31.767.796
Í grunni pr. 01.04.1982:	13.576.421	
Játtað 1982/83	24.700.000	38.276.421
Til góðar		6.508.625

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

UPPSKOT

A.

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
Svinoyar	Ljós fram við vegnum um Eiðið 3/4 av 100.000 kr/árið í 2 ár	100.000
Viðareiðis	Eiðsvík (planering, asfaltering	
		100.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		100.000
	o.a.) 3/4 av 75.000/árið í 2 ár	75.000
Hvannasunds	Gerð av garði og atløguhrúgv í Sandoyarbug, brimgarð í Norðdepli, grótkast út úr Todnesi, leingja kaiina í Norðdepli 3/4 av 600.000 kr./árið í 5 ár	600.000
Elduvíkar	Bátadrátt í Elduvík 3/4 av 75.000 kr./árið í 2 ár	75.000
Elduvíkar	Útbygging av havnalagnum og gerð av bátahyli í Funningsfirði 3/4 av 150.000 kr./árið í 3 ár	150.000
Oyndurfjarðar	Dekksbátahavn í Oyndarfirði 3/4 av 500.000 kr./árið í 4 ár	500.000
Fuglafjarðar	Smábátahavnina 3/4 av 100.000 kr./árið í 3 ár	100.000
Gøtu	Lendingina í Syðrugøtu 3/4 av 80.000/árið í 2 ár	80.000
Runavíkar	Bátahyli á Liknargøtu í Saltangará 3/4 av 200.000 kr./árið í 6 ár	200.000
	Ábøtur á lendingina í Rituvík 3/4 av 100.000 kr./árið í 6 ár	100.000
	Ábøtur á lendingina á Gomlustøð í Lamba, t.e. viðkan av bátadráttinum og leinging av pierinum 3/4 av 150.000 kr./árið í 3 ár	150.000
	Meirkostnað av bryggjuni í Søldarfirði og veg til hana 3/4 av 250.000 kr./árið í 4 ár	250.000
Skála	Bátahyl í Skálafirði 3/4 av 150.000 kr./árið í 4 ár	150.000
		2.530.000

Kommuna	til	Studningur 3/4 av kr.
		2.530.000
	Liðugtgerð av bátahyli á Skála 3/4 av 75.000 kr./árið í 2 ár	75.000
Sjóvar	Pier í Kolbeinagjógv	100.000
	Bátahylin á Selatrað 3/4 av 100.000 kr./árið í 2 ár	100.000
	Bátahylin við Sjógv 3/4 av 75.000 kr./árið í 2 ár	75.000
Sunda	Grótkastið á Oyri og viðkan um havnarøkið á Oyri 3/4 av 200.000 kr./árið í 3 ár	200.000
	Lendibrúnna í Norðskála 3/4 av 100.000 kr./árið í 3 ár	100.000
Funnings	Ábøtur á lendingina í Funningi	100.000
Haldórsvik	Vegin út á Rangagjógv í Tjørnuvík	70.000
Hvalvíkar	Útbygging av bryggjuni í Hvalvík 3/4 av 600.000 kr./árið í 6 ár	600.000
Fuglur og loðskinnadýr	1,0	1,3	1,6	1,5	1,6	0,1	0,1	0,1	0,1	0,1
Kolamunur	0,2	0,3	0,2	0,2	0,4	-	-	-	-	-
Handverk og iðnaður	202,4	248,2	292,2	315,7	367,6	16,9	16,5	15,2	15,5	16,5
Ferningsstovnar	74,3	77,1	116,0	140,7	170,9	6,2	5,1	6,0	6,9	7,7
Handil v.m.	131,5	169,6	217,0	234,5	250,5	10,9	11,3	11,3	11,5	11,6
Byggivirksemi	108,6	118,5	191,5	229,5	253,4	9,0	7,8	10,0	11,2	10,5
Skipaferðsla	37,9	51,0	62,8	66,4	77,9	3,0	3,4	3,5	3,3	3,5
Fiviningar	35,1	40,2	55,3	64,0	67,2	2,9	2,7	2,8	3,1	3,0

Postur, telegrafur og telefon	29,8	35,4	39,9	47,9	56,8	2,5	2,2	2,1	2,3	2,6
Bú-verk	16,9	23,3	30,3	34,0	37,3	1,4	1,6	1,6	1,7	1,7
Sjálfstæðugt yrki	20,3	21,6	25,7	30,2	38,7	1,7	1,4	1,3	1,5	1,8
Búnaðarvirði	35,2	37,0	40,4	44,2	47,6	2,9	2,5	2,1	2,2	2,2
Félagi arbeiði	9,3	10,0	10,4	11,0	12,9	0,8	0,7	0,6	0,5	0,6
Aðrennar tenir	101,0	214,5	265,6	297,8	338,7	35,1	14,5	13,8	14,0	15,2
Tilsamans	1209,5	1541,6	1917,9	2090,6	2234,1	100	100	100	100	100

Gjaldsjavni Føroya 1971-80.
Hallið á gjaldsjavnvágini hjá Føroyum mótvegis útheiminum í 1980 er gjørt upp til 160 mill. kr. Tað er ymiskt, ið hendir á, at hetta hallið er yvirmett, so broytingar kunnu verða gjørdar seinni.

Talva 7. Gjaldsjavni Føroya 1971-80

Vøru- og tænastuviðurskifti	1971	1972	1973	1974	1975	1976	1977	1978	1979	1980
1. Vøruútflutningur nettoinntøkur	+ 77,4	+ 3,6	59,1	+150,9	+187,2	+358,1	+ 98,7	+231,1	+289,8	+248,0
1.1 útflutningur	276,7	322,1	471,4	485,9	464,0	691,4	862,0	974,8	793,1	1005,7
1.2 innflutningur	301,1	325,7	412,3	636,8	651,2	789,5	910,7	986,0	1082,9	1253,7
2. Sjóflutningur										
a. Ferða- og farmaskip nettoinntøkur	5,2	5,5	5,3	5,0	7,0	40,0	47,1	51,2	69,5	70,0
a.1 inntøkur	10,7	12,2	13,8	19,0	16,0	58,0	82,8	90,0	115,1	120,0
a.2 útreiðslur	5,5	6,9	8,5	10,0	11,0	18,0	35,7	38,8	45,6	50,0
b. Fiskiskip	+ 29,5	+ 39,0	+ 50,0	+ 55,0	+ 58,0	+ 63,0	+ 70,8	+ 44,9	+ 36,6	+ 40,0
b.2 útreiðslur	29,5	39,0	50,0	55,0	58,0	63,0	70,8	44,9	36,6	40,0
3. Ferðir útlendinga o.t. nettoinntøkur	+ 20,0	+ 23,0	+ 30,0	+ 34,0	+ 32,0	+ 43,0	+ 98,6	+101,0	+104,7	+120,0
3.1 inntøkur	10,0	11,0	12,0	14,0	16,0	17,0	20,4	21,0	26,1	30,0
3.2 útreiðslur	30,0	35,0	42,0	48,0	48,0	60,0	120,0	122,0	130,3	150,0
4. Tryggingar og orkuveiting o.t. nettoinntøkur	+ 2,8	+ 4,3	+ 2,8	+ 3,5	+ 5,4	+ 3,4	+ 10,2	+ 13,7	+ 15,9	9,0
4.1 inntøkur	3,7	8,1	4,0	4,5	4,8	7,3	3,7	6,3	7,6	32,6
4.2 útreiðslur	6,5	8,4	6,8	8,0	10,2	10,7	13,9	20,0	23,5	23,6
5. Vøru og tænastur annars nettoinntøkur	5,8	0,9	+ 0,3	+ 11,0	+ 13,5	+ 17,0	+ 24,2	+ 58,7	+ 49,1	+140,0
5.1 inntøkur	17,6	13,8	14,7	14,0	14,5	18,0	50,2	46,2	85,3	60,0
5.2 útreiðslur	11,8	12,9	15,0	25,0	28,0	35,0	74,4	104,9	134,4	200,0
1.-5. tilsamans nettoinntøkur	+ 76,7	+ 64,4	+ 18,7	+249,4	+289,1	+244,5	+206,4	+378,3	+426,1	+469,0
inntøkur	315,7	363,5	515,9	533,4	517,5	791,7	1019,1	938,3	1027,2	1248,3
útreiðslur	394,4	427,9	534,6	782,8	806,4	976,2	1225,5	1316,6	1453,3	1717,3
6. Rentur og virðingsbýti í annars nettoinnt.	+ 11,3	+ 8,2	+ 13,6	+ 13,6	+ 7,4	+ 33,0	+ 45,0	+ 54,0	+ 75,0	+ 81,0
6.1 inntøkur	13,2	20,2	18,9	23,2	30,2	32,0	27,6	33,0	52,8	.
6.2 útreiðslur	24,5	28,4	32,5	36,8	37,6	65,0	72,6	87,0	127,8	.
7. Økur annars nettoinntøkur								+ 0,5	+ 2,0	.
7.1 inntøkur								0,5	2,0	.
7.2 útreiðslur										
8. Statskassin nettoinntøkur	93,1	106,3	124,6	152,2	183,5	223,9	263,2	295,0	386,2	390,0
8.1 inntøkur	93,1	106,3	124,6	152,2	183,8	223,9	263,2	295,0	386,2	391,0
Vøru- og tænastuviðurskifti falt nettoinntøkur	17,1	35,7	90,3	+110,3	+132,7	+ 53,6	11,8	+137,8	+122,9	+160,0
" " " " inntøkur	472,0	499,0	659,1	758,8	731,3	987,6	1309,9	1246,3	1460,2	.
" " " " útreiðslur	488,9	456,3	569,1	819,1	644,0	1041,2	1298,1	1404,1	1583,1	.
Misjavni	+ 0,4	3,8	+ 0,5	+ 6,9	- 6,8	+ 5,8	+ 6,0	+ 18,5	+ 55,1	0

Talva 8 **Kapitalflutningur 1971-80.**

Nettoøking av	1971	1972	1973	1974	1975	1976	1977	1978	1979	1980
A. Almennir stovnar og peningastovnar										
1. Landskassin	3,4	+ 3,9	+ 2,5	27,2	2o,4	41,9	1o,9	21,2	44,8	127,o
1.1 Ogn	4,8	5,2		13,3					+ 1o,7	39,9
1.2 Skuld	8,2	1,3	+ 2,5	4o,5	2o,4	41,9	1o,9	21,2	34,1	166,9
2. Kommunur, S.F.V. og aðrir almennir stovnar	15,2	5,2	23,o	28,o	41,3	64,2	22,3	12,8	31,2	52,3
2.1 Ogn	1,6	5,o		+ o,5					18,5	38,1
2.2 Skuld	16,8	1o,2	23,o	27,5	41,3	64,2	22,3	12,8	49,7	9o,4
3. Peningastovnar										
a. Bankar og sparikassar	+ 29,2	+ 28,6	+ 51,6	+ 5o,5	+ 23,2	+ 61,o	+ o,9	+ 8o,2	+ 36,o	+ 7o,o
a.1 Ogn	29,2	28,6	51,6	5o,5	23,2	6o,o	o,9	8o,2	48,o	76,6
a.2 Skuld									12,o	58,6
b. Realkreditstovnurin	6,5	4,6	+ o,9	11,6	6,5	+ 4,2	22,3	12,4	24,4	3.4
b.1 Ogn			o,9						9,7	17,9
b.2 Skuld	6,5	4,6		11,6	6,5	4,2	22,3	12,4	34,1	21,3
c. Bankar lán úr flesquarunninum								6o,o	41,2	.
c.1 Skuld								6o,o	41,2	.
4. Sealuumferið	+ 7,2	+ 5,5	+ 16,7	+ 1,3	+ 12,5	+ 9,9	+ 12,4	+ 11,5	+ 7,2	+ 12,8
4.1 Ogn	7,2	5,5	16,7	1,3	12,5	9,9	12,4	11,5	7,2	12,8
B. Einstaklingsfyritekur o.t.										
5. Útflutningsfelagini netto	+ 8,5	2,8	+ 12,o	+ 7,6	18,2	+ 7,1	+ 52,9	21,9	+ 9,o	+ 76,3
5.1 Ogn	8,9	+ 2,8	12,o	5,3	+ 18,3	1o,1	51,9	+ 22,8	12,3	75,3
5.2 Skuld				2,3	+ 'o,1	3,o	+ o,1	+ o,9	3,3	+ 1,o
6. Aðrar fyritekur og persónar	7,5	+ 12,1	+ 29,1	9,3	57,2	35,5	2,9	119,7	88,6	86,4
6.1 Ogn	13,5	22,4	13,4	o,1						
6.2 Skuld	21,o	1o,3	+ 15,7	9,4	57,2	35,5	2,9	119,7	88,6	86,4
Kapitalflutningar alt	+ 32,7	+ 37,5	+ 89,8	117,7	1o7,9	59,4	+ 7,8	156,3	178,o	16o,o
Ogn	65,2	63,9	54,6	31,o	17,4	61,o	57,4	68,9	85,o	2o2,6
Skuld	52,5	26,4	4,8	86,7	125,3	14o,4	65,2	225,2	263,o	422,6

A 10

Gjaldsjavni Føroya 1980. [1]

	Mió. kr.		
Vøru- og tænastuviðurskifti	**inntøkur**	**útreiðslur**	**nettoinntøkur**
1. Samlaður útflutningur (fob) og innflutningur (cif)	1.005,7	1.253,7	— 248,0
2. **Sjóflutningur**			
a. Ferða- og farmaskip	120,0	50,0	70,0
b. Fiskiskip		40,0	— 40,0
3. Ferðir uttanlands o.t.	30,0	150,0	— 120,0
4. Tryggingar og provisión o.t.	32,6	23,6	9,0
5. Vørur og tænastur annars	60,0	200,0	— 140,0
			— 469,0
6. Rentur og vinningsbýti annars	.	.	— 81,0
7. Gávur annars	.	.	.
8. Statskassin	390,0		390,0
Vøru- og tænastuviðurskifti ialt			— 160,0
Misjavni			0

Kapitalflutningur.

Nettoøking av	**Ogn**	**Skuld**	**Nettoskuld**
A. Almennir stovnar og peningastovnar:			
1. Landskassin	39,9	166,9	127,0
2. Kommunur, S.E.V. og aðrir almennir stovnar	38,1	90,4	52,3
3. **Peningastovnar:**			
a. Bankar sparikassar	78,6	58,6	— 20,0
b. Realkreditstovnurin	17,9	21,3	3,4
c. Bankar lán úr løgugrunninum	.	.	.
4. Seðlaumfarið	12,8		— 12,8
B. Einstaklingsfyritøkur o.l.:			
5. Útflutningsfeløgini netto	75,3	—1,0	— 76,3
6. Aðrar fyritøkur og persónar		86,4	86,4
Kapitalflutningur ialt			160,0

1) Fyribils

Viunulívs- og sethúsabygging í árunum 1971-80. Íløguætlanir fyri árini 1981-1983.

Milj. kr.	1971	1972	1973	1974	1975	1976	1977	1978	1979	1980	1981	1982	1983
1. Fiskiveiðufør:													
a) nýíløgur	38,0	22,7	13,9	99,6	142,7	185,1	203,9	145,6	76,1	96,0	118,7	100,0	90,0
b) - seld				+8,9	+11,1	+8,1	+38,2	+0,7	+6,7	+32,7	+80,0	+60,0	+30,0
2. Fiskiíðnaðarvirki	7,5	11,6	22,6	24,9	20,5	26,2	54,3	48,5	44,8	68,5	61,0	60,0	60,0
3. Fiskaaling	-	-	-	-	-	-	-	-	-	2,7	10,0	15,0	20,0
4. Aðrar íðnaðarbyggingar	8,3	7,3	19,5	22,3	5,0	6,7	40,5	76,8	75,7	55,1	40,0	50,0	50,0
5. Landbúnaðarbyggingar og maskinur	2,3	2,5	2,8	3,0	3,0	3,5	7,0	18,0	23,0	27,0	30,0	30,0	30,0
6. Byggingeistarar	2,5	2,7	3,0	3,0	3,5	4,5	8,3	13,2	29,9	30,1	25,0	25,0	25,0
7. Akfør (til arbeiðsnýtslu)	6,6	6.2	6.8	8,0	8,0	9,0	9,7	12,7	30,2	30,3	25,0	25,0	25,0
8. Ferða- og farmaskip: +)													
a) nýíløgur	9,0	11,0	6,4	8,0	42,3	14,7	13,7	55,7	48,5	61,0	111,0	40,0	40,0
b) - seld	-	-	-	-	-	-	+6.2	-	+7,1	+23,9	+10,0	+10,0	+10,0
9. Skrivstovu- og handils-byggingar	8,3	8,1	9,7	12,2	15,0	8,1	56,0	66,5	42,4	41,8	30,0	30,0	30,0
Vinnulívsíløgur alt	82,5	72,1	84,7	172,1	228,9	249,7	349,0	436,5	356,8	355,9	360,7	305,0	330.0
10. Sethúsabygging o.t.	28,0	29,6	40,0	55,6	68,0	76,0	110,0	140,0	127,2	135,0	125,0	125,0	125,0
Alt einstaklingsíløgur	110,5	101,7	124,7	227,7	296,9	325,7	459,0	576,5	484,0	490,9	485,7	430,0	455,0
Alt skip íkki íroknað	63,5	68,0	104,4	129,0	123,0	134,0	285,8	375,7	373,2	390,5	346,0	360,0	365,0

Tølini 1971 - 1980 eru í ársins prísum. 1981 - 1983 eru í 1981 prísum.

+) Strandfaraskip landsins eru íroknaði í pkt. 7.

Almennar íløgur í árunum 1971-80. Ætlaðar íløgur í árunum 1981-1983.

Mill.	1971	1972	1973	1974	1975	1976	1977	1978	1979	1980	1981	1982	1983
1. Vegir	17,2	39,6	32,5	58,7	50,1	67,7	68,8	63,5	69,7	68,7	70,8	64,5	62,0
2. Havnir	17,5	19,9	17,4	14,6	15,5	11,9	15,8	11,4	24,0	61,5	55,0	49,0	47,0
3. Lendingar	3,4	3,3	6,5	9,6	5,5	10,4	7,3	9,4	8,6	22,9	24,0	22,0	20,0
4. Flogvøllur	1,2	1,0	0,7	3,2	2,2	6,3	9,9	21,6	23,0	13,2	3,0	3,0	3,0
5. Elverk	6,3	7,5	11,1	21,9	11,4	8,9	14,9	19,3	40,7	11,8	148,7	50,0	50,0
6. Postverk	–	–	–	–	–	0,6	0,5	0,0	1,0	2,5	16,0	10,0	10,0
7. Telefonverk	9,5	11,4	15,0	15,5	15,6	12,5	28,5	11,1	12,0	16,0	18,0	12,0	12,0
8. Útvarp og sjónvarp	0,1	0,2	–	*	*	–	1,5	3,0	5,0	9,0	12,0	3,5	–
9. a) Fólkaskúlin og ídrættur	7,9	7,7	15,2	12,7	16,3	16,5	23,1	27,0	30,0	45,0	50,9	46,7	30,7
b) Hægri undirvísing	–	0,6	–	–	–	–	–	–	–	–	–	11,0	21,0
c) Vinnuskúla undirvísing	0,9	2,0	3,5	4,9	9,5	3,2	0,5	0,3	–	–	3,0	8,5	7,5
10. Sjúkrahús o.t.	7,1	3,2	2,5	2,2	0,7	–	1,0	4,0	3,1	5,4	6,5	10,1	8,2
11. Social bygging	2,4	2,9	0,8	6,3	7,2	5,4	4,6	6,2	10,0	5,5	16,0	15,5	17,3
12. Sættar- og løgreglumál	–	0,3	–	0,4	0,1	0,7	0,3	0,6	0,4	0,2	0,2	0,3	0,3
13. Vitaverk	0,5	0,5	0,4	–	–	–	–	0,8	–	–	–	–	–
14. Vaktar- og bjargingar- og royndarskip	–	–	–	5,6	5,2	3,5	0,0	0,0	0,4	3,3	4,0	0,5	0,5
15. Aðrar íløgur í Tórshavnar kommunu	3,9	5,5	7,1	9,3	9,4	20,0	21,3	27,0	32,1	28,2	37,0	25,0	6,0
16. Aðrar almennar íløgur	4,0	4,6	5,9	7,6	3,9	6,7	17,2	10,6	8,2	14,1	27,4	30,9	10,0
Alt	81,9	110,2	118,7	172,5	162,7	174,3	215,2	215,8	268,2	307,3	492,5	362,5	335,5

Tølini 1971 - 1980 eru í ársins prisum. 1981 - 1983 eru í 1981 prisum.

Samlaðar nýíløgur í árunum 1971-1980. Íløguætlanir fyri árini 1981-1983.

Milj. kr.	1971	1972	1973	1974	1975	1976	1977	1978	1979	1980	1981	1982	1983
1. Fiskiveiðifør	38,6	22,7	13,9	90,7	131,6	177,0	165,7	145,1	69,4	63,3	38,7	40,0	60,0
2. Fiskifrøðarvirki	7,5	1,5	22,6	24,9	20,5	25,2	54,3	48,5	54,8	68,5	61,0	60,0	60,0
3. Ferða- og farmaskip	9,0	11,0	6,4	8,0	42,3	14,7	7,5	55,7	41,4	37,1	101,0	30,0	30,0
4. Aðrar virnulívsíløgur	27,4	36,8	41,8	48,5	34,5	31,8	121,5	187,2	201,2	187,0	160,0	180,0	181,0
5. Sethúsabygging o.t.	28,0	29,6	40,0	55,6	68,0	76,0	110,0	140,0	127,2	135,0	125,0	125,0	125,0
Einstaklingaíløgur ialt	110,5	101,7	124,7	227,7	296,9	325,7	459,0	576,5	484,0	490,9	485,7	435,0	456,0
6. Vegir, havnir og flogvøllur	39,3	63,8	55,2	86,1	83,4	96,3	101,8	105,9	125,3	166,3	152,8	138,5	132,0
7. SEV, telefon, útvarp, sjónvarp og postverk	15,9	19,1	26,1	37,4	27,0	22,0	45,4	33,4	58,7	39,3	194,7	75,5	72,0
8. Undirvísing	8,8	10,3	18,7	17,6	25,8	19,7	23,6	27,3	30,0	46,0	53,9	66,2	59,2
9. Sjúkrahús o.t.	7,1	3,2	2,5	2,2	0.7	-	11,0	4,0	3,1	5,4	6,5	10,1	6,2
10. Aðrar almennar íløgur	10,8	13,8	14,2	29,2	25,8	35,3	43,4	45,2	51,1	51,3	84,5	72,2	34,1
Almennar íløgur ialt	81,9	110,2	116,7	172,5	162,7	174,3	215,2	215,8	268,2	307,3	492,5	362,5	305,5
Allar nýíløgur	192,4	211,9	241,4	400,2	459,5	500,0	674,2	792,3	752,2	798,2	978,2	797,5	761,5
11. Øking í fiskagoymslu	17,2	0,6	14,3	15,5	+9,4	-3,0	1,6	+13,5	+14,6	28,7			
12. Øking í øðrum goymslum	0,5	+0,1	-	12,0	-	-	-	26,5	+20,0	+21,0			

Tølini 1971 - 1980 eru í ársins prisum. 1981 - 1983 eru í 1981 prisum.

Byggilán frá peningastovnum 1978 - 1980 A 12

	Tal av lánum	1000 kr.	1000 kr./lán
1978	822	172.610	209
1979	771	171.640	222
1980	697	180.082	258

Kelda: grundtilfar til ársfrágreiðing fyri Føroyar.

Viðm.: Byggilán verða latin til húsabygging og vinnuliga bygging, men grundtilfarið loyvir ikki eina sundurgreining.

Prioritering av sethúsum frá Húsalánsgrunninum A 13

	1980		01.01. -06.07. 1981	
	Tal	1000 kr.	Tal	1000 kr.
Hús upp til 120 m²	203	20.300	106	10.600
Hús yvir 120 m²	172	10.320	58	3.475
Nýggj hús tilsamans	375	30.620	164	14.075
Um- og tilbyggingar	109	2.700	68	1.742
Tilsamans	484	33.320	232	15.817

Kelda: Húsalánsgrunnurin

27/7-1981 — Notat. B 1

Figgjarmál.

Undanfarna landsstýrið legði 1. sept. 1980 fyri tingið eykafiggjarløgtingslóg 1979/1980. Henda hevði eitt hall upp á 19,6 mill. kr. Orsakað av valinum kom henda lóg ikki til viðgerðar.

Eykafiggjarløgtingslógin 1980/81 er um at vera liðug, og vísir hon eitt hall upp á 22,2 mill. kr. Hesar lógir verða lagdar fyri tingið í hesi tingsetu, men tað er landsstýrisins avgjørda ætlan eisini at leggja fyri tingið uppskot um inntøkulógir, sum heilt ella partvís vega upp í móti hesi meirnýtslu landskassans.

1980 gjørdist eitt gott inntøkuár. Samlaða skattaálikningin 1981/82 er tilsamans 706 mill. kr. í móti tilsamans 570 mill. kr. árið frammanundan. Her er sostatt talan um ein vøkstur upp á 23,9%. Sami vøkstur kann ikki væntast at fara at verða í hesum ári, so tað verður helst torført at fáa allan henda álíknaða skattin inn.

Av álíknaða skattinum í hesum figgjarári er 413 mill. kr. landsskattur og er hetta 48 mill. kr. meira enn mett á figgjarløgtingslógini. Orsakað av teirri umlegging til EDV, sum nú fer fram á skattadeildini, er ikki møguligt at siga, hvussu stórur partur av skattinum er goldin. Sí annars hjálagda yvirlit frá gjaldstovuni yvir inntøkur og útreiðslur farna triðing av árinum.

Samhært figgjarløgtingslóg 1981/82 er roknað við tolli og framleiðslugjøldum upp á tilsamans 357 mill. kr. Fyrstu 3 mánaðirnar hevur landskassin fingið 95 mill. kr. inn á hesi konto, so um hetta verður lagið tað, sum eftir er av árinum, fer eisini tann á figgjarløgtingslógini metta upphæddin fyri toll og framleiðslugjøld at halda.

Hóast hesi vóngevandi tøl, so vísir ein júst nú gjørd prognosa fyri landskassans roknskap seinru hálvu av hesum figgjarári eitt likviditetshall upp á 38 mill. kr.

Sum tað framgongur av hjálagda yvirliti frá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, er stuðulin til fiskivinnuna higartil komin upp á 45 mill. kr. Hetta er lutfallsliga minni enn mett á figgjarløgtingslógini og eisini minni enn tilsvarandi tal fyri einum ári síðan. Orsøkin til hetta er tann slakari aktivitetur innan vinnuna fyrra part av árinum.

Við ársenda 1980 átti lønjavningargrunnurin 26,8 mill. kr. til góðar hjá landsstýrinum.

Hjálagt eru skjøl, sum vísa ogn og skuld hins almenna. 31.12.80 var nettoskuldin uttanlands komin upp á 889,7 mill. kr. Her er talan um ein vøkstur eftir einum ári upp á 182,6 mill. kr.

Higartil í ár eru upptikin lán fyri tilsamans 159,9 mill. kr.; av hesum eru 72,4 mill. kr. farnar at gjalda gamla skuld við. Hartil kemur eitt lán, sum júst nú er upptikið, upp á 73 mill. kr. og sum heimilað er landsstýrinum sambært galdandi figgjarløgtingslóg.

B 2

Rakstrarrokoskapur landskassans fyri 1977/78 - 1979/80 og figgjarlógirnar fyri 1980/81 ig 1981/82.

(í 1000 kr.)

	Rakstrarrokoskapur			Figgjarlóg	
	1977/78	1978/79	1979/80	1980/81	1981/82
Inntøkur					
Skattir	218.841	286.401	3ee.443	363.5ee	391.eee
Toll- og framleiðslugjøld	2e9.874	226.938	277.478	32e.Bee	357.eee
Ymisk gjøld	524	651	644	41e	41e
Inntøkur av spæli	363	377	417	35e	35e
Rentur og vinningsbýti v.m.	+3.739	+8.871	+14.562	+21.eee	+31.eee
Landsstovnar	+5.598	+15.e68	+14.977	+22.114	+17.8e7
Partur av avlopi danska fjóðarbankans	2.796	o	19.e36	o	2.5ee
Ymsar inntøkur	17	2	11	5	5
	423.e72	49e.519	568.492	641.951	7e2.45B
Útreiðslur					
Landsstovnar (uttan eindir inntøkuml	o	o	o	o	o
Løgtingið	4.259	5.536	5.4e8	6.e73	6.487
Landsumsitingin	23.2e4	25.914	31.567	35.ee3	4e.e59
Heilsumál	2B.974	4e.8e6	5e.239	47.82B	6e.11e
Samferðslumál	88.66e	11e.5e2	114.e64	86.2en	83.enn
Skúlamál	42.317	51.9e6	58.6e3	59.25e	64.225
Vísind, bókmentir og list	12.823	14.637	15.1e5	18.395	22.e97
Fiskivinna, sigling o.t.	78.413	163.598	151.965	221.775	237.163
Landbúnaður og matrikulering	9.882	12.627	12.1e7	13.659	17.292
Handil, ídnaður o.t.	8.3e6	9.369	2e.894	14.671	12.14e
Almen forsorg	74.573	81.688	98.459	99.727	11e.563
Pensiónsútreiðslur	584	551	774	2.3ee	2.819
Effektivar veðskuldbindingar	4.eee	4.eee	4.eee	6.eee	6.eee
Aðrar og óvissar útreiðslur	1.e56	1.489	1.783	1.46e	1.46e
At leggja í ymsar grunnar v.m.	2.461	+3.874	2.278	+1.884	1.292
Avdráttur av lánum	15.e35	14.864	274	3.eee	o
Avskrivingar	9.e72	9.826	29.4e1	27.5ee	36.857
Ymsar eginkapitalútreiðslur	36	+5	52	15e	15e
Rakstrarúrslit	23.eee	+2.534	+28.663	843	749
	423.e72	49e.519	568.492	641.951	7e2.45B
Upptikin lán					
Úr Føroyum	119.436	1e6.529	113.3e4		
Úr útlondum	1e4.e27	161.335	2e2.259		

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 - TELEX 81279

B 3

Tórshavn, tann 13. juli 1981

Samlaða **skattaálikningin 1981/82** t.v.s. landsskattur, kommunuskattur, kirkjuskattur minus barnafrádrátt er tilsamans 706.189.328,- kr.

Av hesum eru 3 gjøld fallin til gjaldingar, ella uml. 212.000.000,- kr.

Í løtuni fer fram umlegging av arbeiðslagnum á skattadeildini, og um alt gongur eftir ætlan, skuldi skattakartotekini og skattainnkrevjingin farið fram við on line systemi á gjaldstovuni. Men henda umlegging inniber millum annað, at tað p.t. ikki er gjørligt at siga við vissu, hvussu nógvur skattur er inngoldin í hesum fíggjarárí.

Tann 31. mars 1981 vóru skattaeftirstøðurnar hesar:

1978/79 og eldri	59.833.735,83 kr.
1979/80	59.728.397,94 kr.
1980/81	121.004.157,69 kr.
Skattaálikningin 81/82: 3 gjøld	212.000.000,00 kr.
Gjaldkomin skattur pr. d.d.	452.566.291,46 kr.
Av hesum metir gjaldstovan, at goldið er í hesum fíggjarári:	
1980/81 og eldri	— 40.000.000,00 kr.
1981/82	— 130.000.000,00 kr.
	282.566.291,46 kr.
Av tí inngoldna skattinum upp á	170.000.000,00 kr.
hava kommunurnar fingið útgoldið 3 á conto gjøld upp á 23 miliónir ella tilsamans	69.000.000,00 kr.
Eftir liggur í landskassanum uml.	100.000.000,00 kr.

Í fíggjarløgtingslógini 1981/82 er roknað við **tolli og framleiðslugjøldum** upp á tilsamans 357.000.000,00 kr.
og av hesum hevur landskassin fingið tann 5. í h. mð. 95.377.616,46 kr. ella 26,70% av nevndu upphædd í fíggjarlógini. Um hetta er vegleiðandi viðvíkjandi tollinntøkunum í 1981/82, so fer upphæddin í fíggjarlógini at halda.

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 - TELEX 81 279

Tórshavn, 13. juli 1981

II

Hjálagdi rakstrarroknskapur landskassans pr. 6. juli 1981 vísir eitt rakstrarhall upp á 83.411.489,01 kr.

Men til hetta skal sigast, at

1. Skattir, kr. 86.744.930,20 kr. eru 3 gjaldkomnar ratur.
2. Fíggjarlógarjáttanirnar til ymiskar grutmar eru bókaðar.
3. Inntøkur og útreiðslur bókførdar um fíggjarroknskapin framganga sjálvandi ikki í rakstrarroknskapinum. Og yvirhøvur er tað bert talan um útreiðslur: lán úr ymiskum grunnum v.m., hvørs likviditetur liggur í landskassanum, sum hevur ávirkan á landskassans likviditetsstøðu.

Tær undir punkt 2 nevndu grunnsjáttanir (uml. 70 mill.) ávirka omanfyri nevnda rakstrarhall.

Rakstrarúrslit 06.07.81 / 1981/82

		Útreiðslur	Inntøkur
0	Skattir		86744930.20
1	Toll- og framleiðslugjøld		89012347.16
2	Onnur gjøld		323907.96
3	Inntøkur av spæli		90175.10
4	Rentur og vinningsbýti	10257681.35	
5	Part. av avlopi tjóðarb. v.m.		844.74
6	Endurgjøld		41615275.86
7	Ymiskar inntøkur		3880931.96
10	Lønir og samsýningar	54443820.52	
11	Ferðaútreiðslur	795003.56	
12	Útbúgving (skúlar v.m.)	18474.66	
13	Aðrar útr. viðv. starvsfólki	129370.50	
15	Bussruttuútreiðslur	687957.20	
20	Ekstern kommunikation	197632.60	
21	Húsaútreiðslur	1894383.15	
22	Entreprenørrakstur	18474717.35	
23	Skrivstovuútreiðslur	2946041.28	
25	Aðrar rakstrarútreiðslur	3314030.02	
26	Interimskt./viðv. stovnum	39737435.65	
27	Refusiónskonti	5099886.97	
29	Refusiónskonti	56131126.59	
30	Heilsumál	1643830.71	
31	Skúlamál	2613955.47	
32	Vísind, bókment og list	1953000.00	
33	Fiskivinna og sigling	30633299.00	
34	Landb. og matrikulering	5675000.00	
35	Handil, iðnaður o.tl.	3390399.49	
36	Almenn forsorg	4468296.45	
37	Ymiskir studningar	1749559.47	
38	Burturleggingar og avskr.	7825000.00	
39	Samferðslumál	51000000.00	
		305079901.99	221668412.98

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 - TELEX 81279

B 4

Tórshavn, tann 20. juli 1981

Eftir áheitan frá Tórbjørn Poulsen, landsstýrismanni, hevur gjaldstovan (undirritaði) gjørt eina meting um landskassans liggjartørvi í tíðini august 1981 til mars 1982, t.v.s. framhald av prognosuni, sum varð gjørd tann 29. januar 1981 fyri tíðina februar til juli 1981.

Hjálagt verður sent fylgjandi gjørt tilfar, sum lýsir, hvussu inntøkur og útreiðslur landskassans fara at verða í tíðini frá august 1981 til mars 1982:

1. Specifikatión yvir inntøkur og útreiðslur landskassans (5 síður)
2. Specifikatión yvir landskassans terminsgjøld (2 síður)
3. Specifikatión yvir endurgjøld ríkiskassans

Í nevnda tíðarskeiði (august/mars) er roknað við fylgjandi inntøkum:

Goldin skattur	432.500.000,-
— á conto gjøld til kommunurnar	187.200.000,-
	245.300.000,-
Frá kommununum (millumrokning)	25.200.000,-
40%-skattur	280.000,-
12 1/2% P/f-vinningsskattur	1.610.000,-
Sjómansskattur	9.000.000,-
Rentuskattur	5.700.000,-
Vegskattur	5.840.000,-
Tollur og framleiðslugjøld	270.000.000,-
Onnur gjøld	280.000,-
Inntøka av spæli	120.000,-
Rentuinntøkur	1.300.000,-
Ríkiskassaendurgjald	168.889.900,-
	733.519.900,-

Og útreiðslurnar verða mettar soleiðis:

Til stovnar, íløgur, almannamál,	
Lønjavningargrunnin v.m.	643.861.030,-
Landskassalønir, leigur v.m.	93.150.000,-
Fólkaskúlalæraralønir	57.300.000,-
Terminsgjøld	36.490.820,-
	830.801.850,-

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 TELEFAX 81279

Tórshavn, tann 20. juli 1981

II

Sambært figgjarløgtingslóg 1981/82 eru fylgjandi játtanir til grunnar:

Grunnur til heilsumiðstøðir	1.000.000,-
Grunnur til útróðrarstøðir	1.000.000,-
Kommunalur lángrunnur	1.000.000,-
Grunnur til ansingar- og røktarheim	1.000.000,-
Íbúðargrunnur	1.500.000,-
Effektivar veðhaldsbindingar	6.000.000,-
Gistingarhúsgrunnurin	600.000,-
Havrannsóknarskip	400.000,-
Fornminnissavn	200.000,-
Sjónleikarhús	75.000,-
Grunnurin til lærdan lestur	450.000,-
Grunnurin til annan lestur	150.000,-
	13.375,000,-

Hesar upphæddir eru ikki goldnar avvarðandi grunnum.
Landskassans figgjarligi aktivitetur í tíðini frá august 1981 til mars 1982 fer eftir hesi meting at siggja soleiðis út:

Inntøkur		733.519.900,-
Lán-tøkur sambært heimild í figgjarlógini 81/82		73.000.000,-
		806.519.900,-
Útreiðslur	830.801.850,-	
Til grunnar	13.375.000,	844.176.850,-
Kassaundirskot		37.656.950,-

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 - TELEX 81 279

Tórshavn, tann 20. juli 1981

III

Tá ið lániheimildin (73 mill.) og skuldin til grunnar (13.375.000,-) ikki er tikin við, sundurliðar kassaundirskotið seg soleiðis:

August	8.602.485,- kr.
September	3.827.185,- kr.
Oktober	1.106.635, kr.
November	11.845.205,- kr.
Desember	364.935,- kr.
Januar	18.415.835,- kr.
Februar	24.498.785,- kr.
Mars	28.635.885,- kr.
	97.296.950,- kr.

Í prognosuni eru skattagjøldini mett soleiðis:

Álikningin 1981/82	706.189.328,- kr.
20% í eftirstøðum	141.237.865,- kr.
	565.000.000,- kr.
Gamlar eftirstøður	80.000.000,- kr.
	645.000.000,- kr.

Hetta er 60 milliónir minni, enn álikningin 81/82, og tað er sjálvsagt ilt at siga, hvussu metingin fer at halda. Sum kunnugt verður nú arbeitt við at fáa skattainnkrevjingina í tryggari legu, og skuldi avleiðingin av hesi umlegging sjálvandi verið, at skatturin fer at ganga betri inn.

Um tollinntøkurnar, sum innkomnar eru í tiðini, sum farin er av fíggjarárinum, eru vegleiðandi fyri restina av árinum, fara hesar inntøkur at samsvara við fíggjarløgtingslógini, og roknað er við hesum í prognosuni.

Ríkiskassans endurgjøld samsvara við galdandi lógum og skipan og teimum bruttoútreiðslum, sum yvirlitini vísa. Tað skal tó viðmerkjast, at ávísar 100%-refusiónir (t.d. vaccinatiónir, byggistudningar til skúlar v.m.) ikki eru við í inntøku- og útreiðslumetingunum.

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 TEL FX 81279

Tórshavn, tann 20. juli 1981

IV

So at siga allar útreiðsluupphæddirnar í yvirlitinum eru fingnar til vega frá avvarðandi stovnum, ið umsita málsøkini, men í summum førum hevur gjaldstovan gjørt metingar eftir besta førimuni.

Á síðu 2 í yvirlitinum viðvikjandi terminsgjøldum eru terminsgjøldini (bert rentur) hjá trimum lánum, nevniliga

»Roll-over« lán, agent Privatbanken (10 mill. dollars)
»Roll-over« lán, agent Handelsbanken (7 mill. dollars)
Handelsbanken (lán til Vestm. Skipasm. (3 mill. kr.))

ikki tikin við í terminsútreiðslunum, av tí at tað ikki er gjaldstovuni kunnugt hvussu og nær hesi gjøld falla, og heldur ikki hvussu stór tey eru.

Á síðu V í yvirlitinum viðvikjandi inntøkum og útreiðslum landskassans eru spurnartekin sett við

2 deildir til evnaveik
Klaksvikar bókasavn, 1. keyp
Loranstøðin í Vági, 3 lán

Gjaldstovan er ikki før fyri at siga, um hesi økir fara at ávirka landskassans fíggjarstøðu í hesum fíggjarári.

B 5

Útgoldið úr grunninum 1/4 - 30/6 1981:

Minstaløn	745.143,00
Minstivinningur	126.698,00
Prísiskoyti til saltfisk	729.794,00
Hemara- og svartkalvastudningur	20.015,00
Flakastudningur	5.661,00
Rakstrarstudningur	1.889.775,00
Feskfiskastudningur til mynstrað skip	182.426,00
Fritiðarløn	972.646,00
Brennioljustudningur	5,594.134,92
Ídnaðarstudningur	57.726,00
Agnstudningur	919.998,75
Studningur til Ráfiskagrunnin	6.800.000,00
Fyrisæti	296.974,40
	18.340.992,07

Avgreitt higartil í juli uml. 15 milliónir

Eftir liggur í dag óavgreitt fyri uml. 12 milliónir

Tórshavn, 14. juli 1981

LØNJAVNINGARGRUNNUR
SKIPSFISKIMANNA
3800 TÓRSHAVN

B 6

Frá Lønjavningargrunninum:
Tilgóðar hjá landsstýrinum.

	mió. kr.	mió. kr.
Tilgóðar pr. 31/03-1980		12,8
játtan 1/4-31/12-1980 (9/12 av 177) =	132,8	
goldið 1/4-31/12-1980	118,0	
Tilgóðar pr. 31/12-1980 fyri 1980/81		14,0
Tilgóðar pr. 31/12-1980		26,8

B 7

Ogn og skuld hins almenna uttanlands 1.1.1980 og 31.12.1980 (mió. kr.)

	1.1.1980			31.12.1980			Broyting í netto-skuld
	Ogn	Skuld	Netto-skuld	Ogn	Skuld	Netto-skuld	
Landskassin	4.2	202.7	198.4	44.2	365.5	325.3	+ 126.9
Kommunur	18.6	264.8	246.2	0	273.9	273.9	+ 27.7
Almennir stovnar	0.3	198.2	188.9	57.0	270.4	213.4	+ 24.5
Almennir realkreditstovnar	44.0	117.7	23.7	61.9	139.0	77.1	+ 3.5
Tilsamans	67.1	774.4	707.2	163.1	1052.8	889.7	+ 182.6

FØROYA GJALDSTOVA
Tlf. 14660 - TELEX 81 279

B 8

Tórshavn, tann 10. juli 1981

Eftir telefoniska áheitan hevur gjaldstovan gjørt hjálagda yvirlit, ið vísir, hvørji uttanlandslán landskassin hevur.

Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at 7 millióna dollarslánið brúkt til rindan av »Orionláninum« er tikið av sitandi landsstýri, meðan øll hini lánini eru eldri.

Í donskum peningastovnum standa fylgjandi peningaupphæddir:

Kursvinningur (viðv. 6 lánum agent Privatbanken ..... 8.415.764,29 kr.
viðv. lántøkuni til serlán ..... 12.583.132,98 kr.

LANDSKASSANS UTTANLANDSSKULD (Lán, upptikin í Danmark ikki viðroknað)

	Upprunalig lániupphædd	Rest-skuld	Bókað upphædd	Umr. kurs 30.6.81
M/s «SAM»				
Eksportfinans, Oslo	N.kr. 3.869.300,00	N.kr. 1.365.600,00	1.325.087,16 kr.	1.744.554,00 kr.
Til fiskiskip og idna				
Kredietbank S.A., Luxembourg	BFR 200.000.000,00	BFR 168.000.000,00	20.400.000,60 kr.	32.516.400,00 kr.
Til fiskiskip				
Westdeutsche Landesbank	DM 3.800.000,00	DM 3.800.000,00	9.802.168,40 kr.	11.973.800,00 kr.
Til vegir v.m. og fiskiskip				
Westdeutsche Landesbank	DM 18.000.000,00	DM 18.000.000,00	48.400.107,56 kr.	56.718.000,00 kr.
Til vegir, flogvøll og skip				
Algemene Bank Nederland N.V.	HFl 20.000.000,00	HFl. 20.000.000,00	51.825.708,07 kr.	56.750.000,00 kr.
Til serlán				
N.V. Bank voor Nederlandsche	HFl 20.000.000,00	HFl. 20.000.000,00	55.747.292,27 kr.	56.750.000,00 kr.
M/s «NÓNHAMAR»				
Eksportfinans, Oslo	N.kr. 18.805.253,00	N.kr. 16.926.527,70	17.784.512,22 kr.	21.623.639,14 kr.
M/s «MAGNUS HEINASON»				
Eksportfinans, Oslo	N.kr. 2.246.286,00	N.kr. 2.122.768,00	2.538.693,43 kr.	2.711.836,12 kr.
Til vegir, fiskiskip og skúlar				
Bankagent Privatbanken	USD 10.000.000,00	USD 10.000.000,00	58.892.271,89 kr.	78.210.000,00 kr.
Hetta er roll-over kredit, og er tað ikki				
ætlanin at meta um kursávirkanina. T.d.				
hev N. landskassin eina kursvinning í jani				
er uppá ca. 8 milliónir				
Til «Orion fiskið»				
Skandinavisk Handelsbanken	USD 7.000.000,00	USD 7.000.000,00	46.405.800,00 kr.	51.247.000,00 kr.
Hetta er eisini roll-over kredit				

Lántøka hins almenna uttanlands í 1981:

	Upphædd (kr.)
Landskassin[2)]	46.405.800
Kommunur[1)]	21.500.000
Almennir stovnar	36.000.000
Almennir realkredittstovnar	55.972.000
Tilsamans	159.877.800

Upptikin til at gjalda falna skuld:

	Upphædd (kr.)
Landskassin	46.405.800
Almennir stovnar	26.000.000
Tilsamans	72.405.800

Viðm.: 1) Upphæddin er heldur óviss,
2) stórt lán upptikið seinastu dagarnar er ikki tikið við.

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14669 - TELEX 81279

B 9

Tórshavn, tann 16. juli 1981

Eftir telefoniska áheitan í gjár verður hjálagt sent yvirlit yvir landskassans veðhaldsskyldur pr. 31. mars 1981.

Í hesum fíggjarári (1981/82) hevur gjaldstovan fingið fráboðan frá landsstýrinum um fylgjandi nýggjar veðhaldsskyldur:

Lángevari	Lánhavari	Upphædd	Lóg
Tryggingarsambandið	P/f Bil, Havn	1.134.400,-	nr. 87 -80
P/f Føroya Banki	P/f Lyngfrost	4.900.000,-	nr. 18 -60
Copenhagen Handelsb.	Steintór Fagradal	400.896,-	nr. 87 -80
P/f Sjóvinnubankin	P/f Bil, Sand	265.600,-	nr. 87 80
P/f Sjóvinnubankin	P/R Heldin, Gøtu	750.000,-	?
P/F Føroya Banki	Nordafar A/S	3.500.000,-	nr. 78 -78
P/f Sjóvinnubankin	Nordafar A/S	3.500.000,-	nr. 43 -79
			nr. 42 -81
Swiss Bank Corp.	Húsalánsgrunn.	Hfl. 10.000.000,-	nr. 85 -80
Copenhagen Handelsb.	Sands kommuna	Hfl. 1.163.000,-	nr. 44 -78
Bank Mees and Hope	Ídnaðargrunn.	Hfl. 10.000.000,-	nr. 4 -81
Orion Bank	Telefonverkið	USD 12.000.000,-	nr. 70 -79
Der Nord. Invest. bank	Telefonverkið	dkr. 26.000.000,-	nr. 13 -81
Bank Mees and Hope	Húsalánsgrunn.	Hfl. 10.000.000,-	nr. 43 -81
P/f Føroya Banki	P/f Fiskamjøl	490.000,-	nr. 11 -81

Veðhaldsskyldur landskassans
— Fyri lán, ið skulu gjaldast aftur frá 1981 og frameftir.

Lántakari	Aftur-gjalding: Fyrstu ferð	Aftur-gjalding: Seinastu ferð	Høvuðsstólur kr.
P/f Bátafisk	1983	1991	4.320.000
Estra	1981	1986	400.000
Fiskaaling	1981	1981	1.500.000
Flakavirkið J & O	1981	1983	104.925
Gáshólmur	1981	1986	67.200
Giljanes	1981	1981	6.000.000
Eyðfinn Jacobsen	1981	1987	115.000
Gøtu kommuna	1981	1982	3.000.000
Lynfrost	1981	1990	1.750.000
P/f Vestur	1981	1985	8.000.000
P/f Vørðan	1981	1989	13.500.000
Tilsamans			38.757.125

Kelda: Yvirlit frá F.G. pr. 31.03.1981 um veðhaldsskyldur landskassans.
Viðm.: Tað er ikki møguligt út frá kelduni at siga, hvørji veðhald eru játtað í 1981.

Skattamál.

Sum kunnugt hevur seinnu árini verið truplari og truplari at fáa áliknaða skattin inn.

Tann við figgjarársenda útistandandi skatturin er soleiðis vaksin ár undan ári, smbr. hjálagt skjal. 31.3.1975 var eftir av skatti fyri undanfarna skattaár 15,9%. Hetta tal var 6 ár seinni vaksið til 21,6% t.e. í meðal 1% um árið.

Tann skattalóg, sum vit hava í dag stavar seg frá 1963, men hevur hon gjøgnum árini verið fyri stórri og smærri broytingum. Tær heilt radikalu broytingarnar í okkara skattaskipan fóru fram við lógum í 1977 og 1978 tá m.a. serskatting av hjúnum við sjálvstøðugari inntøku verður fyriskipað. Eisini er vert at nevna, at loyvdur frádráttur fyri goldnan skatt ella roknaðan skatt fellur burtur.

Sum tað framgongur av skjalinum frá gjaldstovuni er tað júst úm hetta mundið, at skattaeftirstøðurnar fara at vaksa munandi. Tað er ti nógv sum bendir á, at okkara núverandi skattaskipan ikki er tiðarhóskandi. Stóra talið av skattaklagum, serliga frá tilflytarum, bendir eisini á, at skattalógin frá 1963 stendur til broytingar.

Landsstýrið gongur inn fyri eini samtiðarskattaskipan og til tess at gera tilráðing í málinum er settur ein arbeiðsbólkur av serkønum. Miðað verður imóti, at samtíðarskattur verður at gjalda í Føroyum við ársbyrjan 1983. Lóggrundarlagið undir hesi skipan, t.e. datalóg og lóg um skráseting av skattgjaldarum v.m. verður lagt fyri tingið í hesi tingsetu.

Ein onnur orsøk til, at útistandandi skatturin er stórur og vaksandi, kann vera, at núverandi skattainnheinting er ótíðarhóskandi ella/og ineffektiv. Tessvegna er landsstýrið farið undir at leggja skattadeildina um til EDV. Arbeiðið fer fram júst í hesum døgum, og kann í øllum góðum væntast liðugt um ein mánað. Tó kann ein munandi skjótari avgreiðsla fara fram viðvikjandi rykkjara, váttan, panting v.m. eins og møgulcikin fyri samstarvi við kommunur og arbeiðsgevarar gerst betur.

FØROYA GJALDSTOVA
TLF. 14660 - TELEX 81279

Tórshavn, 5. mai 1981.

Hjáløgd er skattauppgerð **pr. 31. mars 1981** fyri árið sum nú gongur **1980/81.**
Alt eigur at vera goldið og eftirstøðan er **21,56%.**
Til samanbering sá hetda uppgerð soleiðis út fyri hesi farnu ár:

31. mars 1970 fyri 1969/70	15,62%
31. mars 1971 fyri 1970/71	14,18%
31. mars 1972 fyri 1971/72	14,08%
31. mars 1973 fyri 1972/73	15,00%
31. mars 1974 fyri 1973/74	14,80%
31. mars 1975 fyri 1974/75	15,91%
31. mars 1976 fyri 1975/76	17,44%
31. mars 1977 fyri 1976/77	15,68%
31. mars 1978 fyri 1977/78	17,46%
31. mars 1979 fyri 1978/79	20,42%
31. mars 1980 fyri 1979/80	22,35%
31. mars 1981 fyri 1980/81	21,56%

27/7-1981 - Notat. B 11

Tollmál.

Tolllógin hevur verið og er undir hørðum ágangi serliga frá iðnaðinum. Landsstýrið hevur arbeitt við málinum, men má ásanna, at ein rættvís tollløg er torgreidd.

Serliga er tað skilnaðurin millum iðnað og handverk, sum er torførur at greiða. Nú er settur ein arbeiðsbólkur at koma við uppskoti til broyting av tollløgini. Hetta arbeiði er drúgført og kann ikki væntast liðugt fyrr enn um ársskiftið. Inntil tá er landsstýrið sinnað at sleppa rávøru til útflutningsiðnaðin heilt undan tolli.

Notat 27/7-1981 C 1

Fiskivinnuavtalur

Tá ið landsstýrið tók við á nýggjárinum, var bert ein fiskivinnuavtala fyri 1981 liðugt avgreidd, nevniliga við Sovjetsamveldið. Eitt av fyrstu verkevnum landsstýrisins var tí at byrja ella fullføra byrjaðar samráðingar við hini londini, ið Føroyar vanliga hava avtalu við um fiskiskap.

Mált í fiskinøgd og fiskavirði eru okkara týdningarmestu avtalur tær við Ísland, Noreg og Sovjetsamveldið og EF. Harumframt hava vit smærri avtalur við Kanada, Svøriki og Eysturtýskland. Umframt hetta fáa vit, sum lið í NAFO-samvinnuni tilluttaðar kvotur á internationalum havøki út fyri eysturstrond Kanada.

Avtala okkara við Sovjetsamveldið fyri 1981 kom at liggja á eitt sindur hægri støði enn 1980, og tað sama galt avtalunna við Noreg. Avtaluna við Ísland fingu vit viðariført óbroytta frá 1980, og harumframt skulu vit møguliga seinri tosa aftur við íslendingar um lodnufiskiskap. Við Svøriki fingu vit somu avtalu sum fyri 1980. Við DDR fingu vit eina avtalu á munandi hægri støði. Frá Kanada hava vit fingið eitt sindur frægari vilkor enn í 1980, og harumframt lyfti um møguligar betringar viðvíkjandi toskakvotuni.

Samráðingarnar við EF gjørdust uppaftur striltnari enn árini frammanundan.

Landsstýrið royndi av øllum alvi at steðga teirri niðurgongd í sínámillum fiskiskapinum, ið verið hevði í undanfarnu árum.

Hetta eydnaðist eisini, og í februar varð undirritaður sáttmáli, ið gav næstan sama javnvágarstøði og eitt sindur betri yvirvekt enn seinast. Kortini vóru ikki allar súður syftar við tað, at tað ikki eydnaðist EF kommisiónini at fáa sáttmálan góð kendan í ministararáðnum, av tí at Bretland setti seg ímóti hesum, við teirri grundgeving, at sáttmálin var ov góður fyri Føroyar.

Orsakað av tvørrandi fleksibiliteti frá EF-landa síðu, varð sínámillum fiskiskapurin longu uppathildin 1. januar, og er hann ongantíð komin í gongd aftur.

Sum kunnugt umfatar ein partur av EF-sáttmálanum fiskiskap hjá føroyingum í donskum sjógvi og hjá dønum í føroyskum sjógvi.

Vísandi til ríkisfelagsskapin hevur tað eydnast at uppihildið hesum fiskiskapi higartil í ár. Føroyingar hava sostatt kunnað roynt eftir teimum kvotunum, ið tilluttaðar hava verið t.d. av rækjum í grønlendskum sjógvi og síld í Skagerak eins og danskir fiskimenn hava kunnað roynt eftir svartkjafti undir Føroyum. Ymsar royndir hava verið gjørdar millum annað frá danska fiskimálaráðharranum og danska uttanríkismálaráðharranum at fáa bretar at slaka, og at fáa fiskiskapin uppafturtiknan. Bretar hava verið ógvuliga trekir til hetta, og hava lagt so tungar treytir við, at vit ikki hava kunnað gingið við til meira enn ein brotpart av teimum. Úrslitið er, at enn liggja vit í avtaluloysi við EF, og fryktandi er fyri, at so verður restina av árinum.

Í Útnyrðingsatlandshavi stóðu vit fyri munandi niðurskurði í toskakvotu okkara á Flemish Cap, men eydnaðist tað okkum á eykafundi í juni í ár, at fáa hækkað kvotuna uppaftur á sama støði sum í 1980.

Lita vit at eini heildarmynd av fiskisáttmálum okkara við útlond, siggja vit, at tær samlaðu kvotur, ið vit føroyingar fáa, sambært tvísiðaðar avtalur við onnur lond og í NAFO, alt í alt hava verið næstan 230.000 tons fyri 1981, og tann nøgd, ið vit hava latið øðrum londum hevur verið umleið tann sama.

Av botnfiski hava vit fingið tillutað út við 45.000 tons, og hava latið umleið 25.000 tons. Av virðismiklum pelagiskum fiski sum makreli og síld, hava vit latið 2.000 tons og fingið góð 15.000 tons. Av øðrum iðnaðarfiski, har uppí svartkjafti, sum vit enn í hvussu er rokna sum iðnaðarfisk, hóast vit hava stórar vónir til hann sum matfisk, hava vit latið knapt 200.000 tons, og hava fingið umleið 165.000 tons. Harumframt hava vit so fingið nakað av rækjum og nakað av hemara.

Siggja vit burtur frá EF-sáttmálanum, sum jú ikki er komin og helst heldur ikki kemur í gildi, so eru tær nøgdirnar, ið vit fáa aðrastaðni enn úr EF 124.000 tons, og tær nøgdir, ið vit lata til aðrar enn EF góð 190.000 tons. Av nøgdunum vit fáa, eru góð 42.000 tons botnfiskur, 2.000 tons makrelur og góð 80.000 tons iðnaðarfiskur. Av tí vit lata hesum londum, eru bert 8.000 tons botnfiskur, meðan vit lata 2.000 tons av makreli, umleið 175.000 tons av svartkjafti og harumframt eina tillating av 120 tonsum av laksi til danskar fiskimenn uttanfyri allar avtalur við EF.

Til EF hava vit sambært ikki góðkendu avtaluna lovað burtur um 17.000 tons av botnfiski og 25.000 tons av svartkjafti og fáa aftur fyri góð 2.000 tons av botnfiski, 13.000 tons av makreli, 650 tons av síld, 86.000 tons av iðnaðarfiski og 1.800 tons av rækjum.

Tað sum vit fáa frá Sovjetsamveldinum, Noreg, Svøriki og DDR umframt EF, um so er at avtalan har kemur í lag, er nakað, ið vit lata aftur fyri. Tað sum vit fáa frá Kanada, Íslandi og úti á Flemish Cap, er nakað, ið vit ikki nýtast at lata nakað aftur fyri, og eru hesar avtalur tí serstakliga virðismiklar fyri okkum. Tær fyrr nevndu avtalurnar eru tó eisini ein hjálp fyri okkum við tað at tær loyva okkum at hava ein meira fjølbroyttan vinnustruktur og geva okkum betri stundir til at leggja um til fiskiskap í føroyskum sjógvi burturav.

Sum áður nevnt, lata vit góð 175.000 tons av svartkjafti undan Føroyum, og hava í ár fiskað góð 30.000 tons sjálvir.

Svartkjaftafiskiskapurin í Landnyðrings-Atlantshavi, hevur sum kunnugt vundið nógv upp á seg seinastu árini, og við tí týdningi svartkjafturin hevur fyri okkum, er tað natúrligt at vit hugsa um, hvat ið verða skal av hesum stovni. Landsstýrið hevur tí heitt á danska fiskimálaráðið, ið røkir áhugamál okkara innanfyri altjóða fiskivinnu vísindaliga ráðið ICES um at biðja henda stovn um eina tilráðing við tí í byggju at áseta eitt TAC, tvs. mest loyvdu veiðu fyri svartkjaft. Vit vóna at hesin spurningur síðan kann verða tikin upp í tí nú endurskoðaðu NEAFC-samskipanini, t.e. sáttmálanum viðvíkjandi fiskiskapi í landnyðrings Atlantshavi.

Danska stjórnin og Føroya Landsstýri hava vegna Føroyar undirritað henda sáttmála, og ætlar landsstýrið í ólavsøkutingsetuni at leggja sáttmálan fyri tingið til góðkenningar soleiðis, at vit kunnu boða frá, at vit taka lut í tí nýggja NEAFC-felagsskapinum. Har vil landsstýrið arbeiða fyri áseting og býti av TAC fyri svartkjaft, og eisini við spurninginum um endurreising av sonevnda atlanto-skandiska sildastovninum.

Føroyingar hava í ár eisini tikið lut í millumlanda samráðingum um laks.

Sum kunnugt hevur bráðligi vøksturin í laksaveiðu okkara vakt miklan ans og sterka mótstøðu í teimum londum, í hvørs áum laksurin, ið gongur við Føroyar hevur sín uppruna. Vit mugu viðganga, at hesi lond, ið ofta ofra nógvan pening uppá at seta laks út, hava krav uppá at fáa nakað av hesum laksi heimaftur í árinar. Hinvegin hava vit arbeitt fyri at fáa teir at viðurkenna rætt okkara at taka okkara part av skurðinum av tí laksi, ið gongur á beiti hjá okkum, og hevur hetta eydnast okkum í ávísan mun. Tað verður kortini torført at náa til semju um ein altjóða sáttmála fyri Norðuratlantshav, sum kann sameina hesi bæði sjónarmið. Men, sjálvt um vit ikki fáa ein laksasáttmála, so mugu vit siggja í eyguni, at okkara grannalond hava hug at leggja treytir okkara laksafiskiskapi viðvíkjandi, tá ið vit samráðast við teir um fiskiavtalur.

Eisini viðvíkjandi stórhvalaveiðu hava vit verið úti fyri mótstøðu frá sterkum kreftum í altjóða samfelagnum. Tað er so, at millumtjóða hvalaveiðunevndin (IWC) í 1976 hevur friðað tann finnhvalastovnin, ið teir nevna tann vesturnorsk-føroyska. Um hetta mundið var ongin áhugi í Føroyum fyri slíkari veiðu, og varð tí ikki mótmælt. Hin vegin so var bannið heldur ikki ásett formelt innanlands. Í 1977 varð fiskimark okkara, sum kunnugt, flutt út, og hava føroyskir myndugleikar sostatt møguleika fyri at umsita tað livandi rikidømið í okkara fiskiøki, eisini hvat ið hvali viðvíkur, hetta sjálvsagt við virðing fyri millumtjóða avtalum millum annað um tey sløg, ið ferðast ímillum føroyskt fiskiøki og altjóða fiskiøki ella fiskiøkini hjá øðrum londum. Hetta seinasta er eisini galdandi fyri stórhvalin, ið sum kunnugt er rættiliga viðgongdur.

Í fjør sá landsstýrið seg noytt til eftir kravi frá donsku sjórnini, sum aftur í sínum lagi var undir trýsti frá IWC, at steðga royndini eftir finnhvali.

Landsstýrið hevur síðan í samráð við fiskirannsóknarstovuna og fróðskaparsetrið góðkent eitt uppskot til vísindaligar royndir viðvíkjandi finnhvali. Ætlanin er at telja og merkja finnhval, og at skjóta nakrar fáa hvalir, um so er, at strangar treytir viðvíkjandi talinum av sæddum hvalum verða uppfyltar. Til tess at uppfylla krøvini frá IWC, hevur landsstýrið lgjøgnum donsku stjórnina fyrilagt hesa vísindaligu ætlan fyri vísindaliga ráðið hjá IWC, sum hevur tikið undir við summum pørtum av ætlanini, men ikki við ætlanini um skjóting, millum annað við teirri grundgeving, at tað neyvan fæst nóg mikið burtur úr at skjóta so fáar hvalir. Við at fyrileggja uppskotið fyri vísindaliga ráðið, hevur landsstýrið uppfylt tey krøv, ið millumtjóða hvalakonventiónin setir.

Landsstýrið metir tað at vera av so stórum týdningi, at føroyingar eisini kunnu nýta henda partin av ti livandi rikidøminum á landleiðini, at tvørrandi vitan um stovnin ikki í longdini kann góðtakast sum undanførsla fyri at lata vera við at gera nýtslu burtur úr honum.

Umframt tær avtalur, ið landsins myndugleikar hava gjørt við onnur lond um fiskiskap, so hevur landsstýrið við áhuga fylgt við í royndunum hjá einstaklingafyritøkum at tryggja føroyskum fiskiskipum vinnumøguleikar í fremmandum londum. Landsstýrið hevur hjálpt til, tá ið brúk hevur verið fyri »officiellum kanalum« og hevur eisini stuðlað figgjarliga í einstøkum førum.

Landsstýrið vónar, at tað fer at eydnast føroyskum vinnulívi at gera seg galdandi á hesum øki, og vil gera sítt ítarsta fyri at leggja viðurskiftini so væl til rættis sum tilber, m.a. í samvinnu við danskar stovnar, ið taka sær av samvitsmu við menningarlond.

Landsstýrið samráðist í løtuni við hesar stovnar um hvussu henda samvinnan best kann leggjast til rættis.

Yvirlit yvir fiskikvotur til Føroyar sambært altjóðaavtalur í 1981 (tons)

Talva 1.

Land / Fiskaslág	USSR	Noreg	Svørikí	DDR	Ísland	Kanada	Altjóða	EF	Ialt EF ei frokn.	Ialt EF frokn.
Tonkur	11.000(1)	3.600(1)(5)	700	800(11)	6.000	1.300(13)	3.400(5)(15)	(16)	26.800	26.800
Annar botnfiskur	(2)	3.100(4)(5)	-	-	11.000	1.000	200(5)	2.250(16)	15.300	17.550
Botnfiskur falt	11.000	6.700	700	800	17.000	2.300	3.600	2.250	42.100	44.350
Makrelur	-	2.000(6)	-	-	-	-	-	13.000(17)	2.000	15.000
Síld	-	-	-	-(11)	-	-	-	650(18)	-	650
Pel. matf. falt	-	2.000	-	-	-	-	-	13.650	2.000	15.650
Loðna	16.000	17.500(7)	-	-	-	-	-	-	32.500	32.500
Brislingur, rognumakrelur	-	- (8)	-	-	-	-	-	21.000(19)	-	21.000
Uppfiskvørður, hábeinsild v.m.	-	16.000(8)	-	-	-	-	-	45.000	18.000	63.000
Svartkjaftur	-	10.000(10)	-	-	20.000	-	-	20.000	30.000	50.000
Iðnaðarfiskur v.m. falt	16.000	45.500	-	-	20.000	-	-	86.000	80.500	166.500
Rækjur	- (3)	-	-	-	-	- (13)	-	1.800(20)	-	1.800
Annað	-	-	-	-	-	-	-	300(21)	-	300
Alt	26.000	54.200	700	800	37.000	2.300	3.600	104.000	124.600	228.600

Yvirlit yvir fiskikvotur, ið lætnar verða útlendingum undir Føroyum í 1981.

Talva 2.

Fiskaslag \ land	USSR	Noreg	Svørriki	DDR	Ísland	Danmark	EF	Ialt EF ei íroknað	Ialt EF íroknað
Toskur og hýsa	-	-(2)	-	-	-	-	2.500(9)	-	2.500
Annar botnfiskur	-(1)	8.000(3)	-	-	-	-	14.700(10)	8.000	22.700
Botnfiskur falt	-	9.000	-	-	-	-	17.200	8.000	25.200
Makrelur	1.000	1.000	-	-	-	-	-	2.000	2.000
Svartkjaftur	80.000	68.000(4)	-(6)	6.600	20.000	-(8)	25.000	174.600	199.600
Lakaur	-	-	-	-	-	120(7)	-	120	120
Annað	-	-(5)	-	-	-	-	-	-	-
Falt	81.000	77.000	-	6.600	20.000	120(8)	42.200	184.720	226.920

Notur til talvu 1

(1) 2.000 tons í Eystrasalti, 9.000 tons í Barentshavinum, harav kunnu 2.700 tons fiskast norsku megin.
(2) Í toskakvotuni er íroknað hjáveiða.
(3) Royndarveiða.
(4) Harav 1.600 tons í Barentshavinum, nevniliga 600 tons av hýsu, 1.000 tons av kongafiski, upsa og svartkalva, tó hægst 500 tons av hvørjum slag.
(5) Í Noregsavtaluni er umrøtt, at føroyingar avmarka veiðu sína í Svalbard-økinum til 500 tons av toski og 200 tons av øðrum.
(6) Harav 1.000 tons í Norðsjónum og 1.000 tons sum royndarfiskiskapur n.f. 62.
(7) Harav 2.500 tons við Jan Mayen.
(8) Hægst 3.000 tons undir iðnaðarfiski.
(9) Kann hækkast við 5.000 tonsum, sb. (4).
(10) Harav 5.000 tons við Jan Mayen og 5.000 tons sum royndarveiða við nót.
(11) Harav kunnu upp til 400 tons skiftast um við upp til 600 tons av síld í lutfallinum 1:1,5.
(12) Samráðingar um hækking ikki loknar.
(13) Eingin almenn avtala, men møguleika fyri fyritøkuavtalum.
(14) Hemaraloyvi verður givið til ávís skip.
(15) 500 tons við Svalbard, sb.(5), 2.900 tons á Flemish Cap, sambært NAFO-samtykt og hartil møguleikar at fiska av kvotu til »aðrar« á Stórabanka, upp til ca. 600 tons.
(16) Harav longa og brosma við Rock All 1.000 tons
blálonga v.f. Skotland 200 tons
hjáveiða í iðnaðarfiski 750 tons
svartkalvi við Grønland 300 tons
Tilsamans 2.250 tons

(17) 2.000 tons í eystara og 11.000 tons í vestara stovni.
(18) Í Skagerak.
(19) Brislingur 15.000 tons.
Rossamakrelur 6.000 tons.
(20) Vesturgrønland 600 tons.
Eysturgrønland 1.200 tons (royndarveiða).
(21) Hemari.

Notur til talvu 2

(1) Loyvi til royndarveiðu á djúpari vatni.
(2) Bert sum hjáveiða.
(3) Hægst 2.000 tons av upsa.
(4) Harav 5.000 tons í royndarfiskiskapi uttanfyri høvuðsveiðitíðina.
(5) Brugda í minni nøgd.
(6) Svartkjaftaloyvi til 2 skip.
(7) Laksaloyvi upp á 20 tons til 6 skip í tíðini okt. 1980 - juni 1981.
(8) Donsk skip hava høvi at fiska svartkjaft v.m. undir Føroyum, hóast eingin avavtala hevur verið í gildi mótvegis EF.
(9) Helvt um helvt av hvørjum.
(10) Harav upsi 3.500 tons

kongafiskur	4.800 tons
blálonga	4.500 tons
longa	500 tons
brosma	400 tons
flatfiskur	500 tons
annað	500 tons
Tilsamans	14.700 tons

Notat 27/7-1981

D 1

Fiskivinnan.

Fiskivinnan, sum framvegis er okkara høvuðsvinna burturav, hevur eisini í ár havt stórar trupulleikar at dragast við, sum í høvuðsheitum stava frá hækkandi oljuprísum og umstrukturering av fiskivinnuni til føroyskt sjóøki og betri útbygdum fiskiidnaði á landi.

Hesir trupulleikar eru torførir at koma burtur úr, serliga táið tað framhaldandi skulu takast fleiri og fleiri skip heim á føroyskt øki. Tað, sum mest hevur viðvirkað til hetta, er sjálvandi tann støðan, at fiskivinnuavtalan við EF ikki er góðkend (fyrrenn nú), av tí at bretar hava blokerað hana. (Hóast hetta hevur tó borið til at fiskað rækjur við Grønland og sild í Skagerak.)

Stuðulin

Stuðulin til fiskivinnuna, sum í fjør var uppá 192 mió. kr., er fyri figgjarárið 1981/82 uppá 206 mió. kr., sum er ein vøkstur uppá góð 7%.

Grundarlagið undir útrokningunum til stuðulin er í høvuðsheitum uppstillingin hjá Fiskivinnuráðnum, sum tað eisini var fyri síðsta ár. Í ár bar til at eftirkanna, hvussu tølini hjá Fiskivinnuráðnum passaðu til veruligu rakstrartølini, og vísir tað seg, at tey eru rættiliga bein. Tí bar til í ár at fylgja teimum tilráðingum í upphæddum, sum ráðið mælti til, meðan tað ikki varð gjørt í fjør. At vøksturin ikki er størri bendir á, at stuðulin komandi ár ikki skuldi vaksið, men heldur minkað, um gongdin annars verður tann sama.

Veiðan á føroyskum øki.

Veiðunøgdin á føroyskum øki av feskfiski higartil í ár er nakað tann sama sum somu tíð í fjør, hóast januar og februar royndust sera ringir, mest vegna veður. Toskaveiðan er tann sama, hýsan um 10% minni, men upsin gott 20% meira. Kongafiskaveiðan er minkað við meir enn helmingi, men blálongan er tvífaldað. Roknast kann við, at blálonguveiðan fer at taka seg munandi meira upp, nú trolararnir seint í vár høvdu rættiliga góðan fiskiskap vestanfyri Føroya Banka á heilt djúpum vatni (450-500 favnar). Her varð eisini rakt við hampiliga stórar nøgdir av langasporli, sum er nýtt fiskaslag í okkara veiði, og tað sær út til at vera møguligt at selja hendan fisk sum flak fyri rættiliga góðan prís.

Svartkjaftur.

Tað varð álagt landsstýrinum at virka fyri, at eitt TAC var sett á svartkjaftin. Nú hevur ALDM tilmælt eitt verju-TAC á hann uppá eina millión tons. Hetta merkir, at samlaða veiðan eftir svartkjafti í Norðuratlantshavi eigur ikki at fara upp um eina millión tons. Seinastu tvey árini hevur hann ligið omanfyri hetta.

Tá TAC er komið á svartkjaftin, skal hann býtast millum tjóðirnar, sum fiska hann. Her skuldu føroyingar átt ein stóran part, nógv størri enn tað, sum vit higartil hava fiskað.

Tað, sum serliga er øðrvísi við svartkjaftafiskiskapinum í ár, er at ein stórur verksmiðjutrolari (Giljanes) er komin til landið.

Laksur.

Miðaltöl fyrir 1978		1936	333	19	135	285	-	654	41	122	152	37	207			
miðaltöl fyrir 1979		1951	413	26	127	271	-	569	48	152	91	32	147			
miðaltöl fyrir 1980		2724	566	32	166	345	-	854	55	235	73	21	373			

Miðaltøl fyri útróðrarbátar 1978-1980.

Bátastødd:	Brutto-inntøkur 1.000 kr.	Herav eigara-lønir.	Fiski-partar	Fiski-greiðir	Vistir	Olja og smyrji-olia	Umsiting: motor og skip	Lading-arútreiðslur	Trygg-ingar	Agn, fsur salt	Annað	AVLOP: t/rentur avdrøtti & fyrisz
Undir 25 RRT v/troll.												
Miðaltøl fyri 1978	708		352	45	7	37	66	1	22	95	9	105
miðaltøl fyri 1979	569		232	46	5	36	53	2	18	92	4	67
miðaltøl fyri 1980	741		324	66	3	61	81	1	19	108	6	73
Ml. 25-40 RRT v/troll.												
Miðaltøl fyri 1978	743		370	78	9	46	105	2	32	59	15	38
miðaltøl fyri 1979	757		366	77	8	75	56	2	35	53	7	74
miðaltøl fyri 1980	976		455	88	15	102	75	3	37	59	14	131
Yvir 40 RRT v.troll.												
Miðaltøl fyri 1978	1019		487	106	13	74	113	5	54	40	9	117
miðaltøl fyri 1979	786		356	79	14	95	94	7	56	38	6	41
miðaltøl fyri 1980	1157		499	93	17	125	126	13	53	64	9	159
Undir 25 RRT												
Miðaltøl fyri 1978	233		111	19	1	8	28	1	12	36	3	14
miðaltøl fyri 1979	309		140	20	2	15	32	2	15	53	3	27
miðaltøl fyri 1980	411		178	27	2	25	46	2	19	65	8	36
Ml. 25-40 RRT												
Miðaltøl fyri 1978	645		317	48	6	23	78	2	25	99	5	42
miðaltøl fyri 1979	485		235	32	5	30	67	2	23	79	4	7
miðaltøl fyri 1980	654		297	49	6	52	80	10	26	99	5	30
Ml. 40-60 RRT												
Miðaltøl fyri 1978	872		424	67	7	37	89	4	34	120	5	87
miðaltøl fyri 1979	737		352	54	8	45	90	3	33	94	5	52
miðaltøl fyri 1980	1083		500	75	13	85	82	4	43	106	8	167
Yvir 60 RRT												
Miðaltøl fyri 1978	952		502	71	16	54	133	12	34	87	11	33
miðaltøl fyri 1979	834		431	63	19	63	87	15	34	44	6	72
miðaltøl fyri 1980	1193		577	93	19	99	154	39	50	61	14	88

Ídnaðurin í Føroyum

1. FÓLK Í VINNU

Í Føroyum eru í dag o.u. 18.300 fólk í vinnu. Býtið er:

1. Fiskari/landbúnaður (primervinnan)	:	18% — t.v.s.	3.300 fólk
2. Ídnaður, handverk, tænastuídnaður (sekundervinnan)	:	33% — t.v.s.	6.100 fólk
3. Handil og flutningur	:	24% t.v.s.	4.300 fólk
4. Heilsuverk, sosialir stovnar, undirvísing, almen fyrisiting v.m.	:	25% — t.v.s.	4.600 fólk
Tilsamans			18.300 fólk

Innan »framleiðandi vinnulívið« (1 og 2 omanfyri) er myndin hendan:

1. Primervinnan

Fiskari	91% — t.v.s.	3.000 fólk
Landbúnaður	9% — t.v.s.	300 fólk
Tilsamans		3.300 fólk

2. Sekundervinnan

Fiskavirkir	32% — t.v.s.	1.950 fólk
Onnur matvøruframleiðsla	6% — t.v.s.	370 fólk
Tekstilídnaður	3% — t.v.s.	180 fólk
Byggiídnaður	27% — t.v.s.	1.650 fólk
Tænastuídnaður (verkstaðsvirksemi)	25% — t.v.s.	1.530 fólk
Annað	7% — t.v.s.	420 fólk
Tilsamans		6.100 fólk

Vert at geva gætur er, at umleið 51% av fólkinum í vinnu starvast innan framleiðandi vinnulívið. Í øllum hinum Norðanlondunum er hesin partur um 45% ella lægri. Hin vegin eru vit eftirbátar hvat viðvikir kvinnum í vinnu í tí framleiðandi vinnulívinum. Talið er her ca. 18% — t.v.s. 10-20% lægri enn í hinum Norðanlondunum.

2. Framleiðandi vinnulívið í menning

Í søguligum máti er tað valla skeivt at siga, at 60-ini vóru ár »endurnýggjan skipaflotans« meðan 70-ini vóru »byrjunarár idnaðarins«.

Fyrst í 70-unum fingu vit Ídnaðargrunnin, Menningargrunnin og Ídnaðarstovuna, samstundis sum gjørdar vóru ymiskar broytingar í skatta- og tollløggávuni til bata fyri idnaðin.

Ov lítið gjørt ella ikki — talið á virkjum er hóast alt nærum 3-faldað síðani tá — úr gott 200 til í dag gott 600.

Avmarkaðu veiðumøguleikar okkara, serstakliga eftir teimum vanligu fiskasløgunum, ger, at vit sjálvandi mugu halda áfram við útbygging av idnaðinum. Men ein líka týdningarmikil uppgáva verður í komandi árum at royna at stabilisera verandi virksemi. Lyklaorðini her eru: *Skynsamur skatta- og tollpolitikkur* og ein *miðvísur útbúgvingar- og orkupolitikkur.*

Nøkur nýggj 5- faldan av talinum á virkjum vera vit tó neyvan at uppliva í 80-unum.

3. Framtaksleiðir

3.1. Figging

Sæð frá einum búskaparligum sjónarmiði er idnaðurin, hvat viðvikir iløgur í nýggj virkir, nútimansgerðir og viðkan av verandi virkjum, idag betri fyri enn nakrantíð áður.

Fyri komandi 3-ára skeið eru samlaðu lán til idnaðin úr Ídnaðargrunninum mett til 70 mill. kr. og úr Menningargrunninum helst 40-50 mill. kr. (incl. studningsveitanir). Upphæddirnar eru tilsamans meira enn ein tvífaldan av lán- og studningsveitanum úr hesum grunnum í farna 3-ára skeiði (77-80).

Lán til nýggj og verandi fiskavirkir eru tá ikki íroknað mettu lán- og studningsveitan úr grunnunum. Hesi virkir verða í dag sum kunnugt fyri ein part fíggjað við láni og studningi úr Egnsudviklingsfonden.

Samanumtikið — og í øllum førum hvat viðvikur iløgufígging — er føroyski idnaðurin í dag uppá seg — minst líka, ja kanska heldur betri fyri, enn idnaðurin hjá okkara norðurlendsku grannum. Men tað hava vit sum nevnt eisini fyri neyðini, skulu vit megna ta umstrukturering av vinnulivinum, ið avmarkaðu veiðimøguleikarnir higartil hava havt við sær og helst í enn størri mun koma at hava við sær næstu árini.

3.2. Ídnaður knýttur at heimamarknaðinum

Heimamarknaðurin er lítil og viðbrekin. Tað vil tí altíð vera avmarkað, hvat og hvussu nógv vit hava møguleikar at framleiða sjálvi av vørum, ið í dag verða innfluttar. Her vera vit helst í framtíðini at prioritera framleiðsluna, ið er knýtt at grund-

tørvi okkara (mat, hús, klæðir, reingerð, bøkur, blað o.a.t.) og at okkara høvuðsvinnu — fiskivinnuni (skipasmiðjur, mek. verksmiðjur, fiskireiðskapsidnaður, útgerð til fiskavirki o.s.fr.). Idnaður knýttur at landbúnaðinum verður sjálvandi at bólka innan somu prioritetsrammur.

Fyri seg sjálvan stendur *heimaidnaðurin*. Støðið undir hesari týðandi vinnugrein verður helst í framtíðini Lista- og handverkaraskúlin á Sandoynni. Í løtuni verða møguleikarnir kannaðir fyri at víðka útbúgvingina (sum í dag bert fevnir um tekstillist) við eini keramiklinju. Heimaidnaður knýttur at lutum framleiddir úr skinnum, ull, hálvgimsteinum o.a.t. verður helst eisini í ein vissan mun at samskipa við henda skúlan.

3.3. Fiskiidnaðurin

Flaka- og saltfiskavirkir

Líkt er til, at vit nú eru um at koma á mál hvat viðvíkir tey vanligu flaka- og saltfiskavirkini. Undir øllum umstøðum verður, hóast mest skynsomu stovnsrøkt, lítil ráfiskanøgd til avlops, tá tey virkir, ið nú eru í umbúnað (Sandur, Sørvágur og Hvalba) eru bygd og víðkanarætlanirnar á verandi virkjum eru framdar. Hetta er sjálvandi trcytað av, at framleiðsluorkan á virkjunum verður útnyttað so rationelt sum gjørligt í mun til ráfiskanøgdirnar dag undan degi.

Vegna vaksandi orkuprísir og lutvís fallandi marknaðarprísir er veruligi vinningurin á frystum slógvi (minkafóður) í dag helst negativur hjá nógvum virkjum. Mest skynsama loysnin her verður helst ombygging til víðkaða farsframleiðslu og/ella ensilagaframleiðslu. Uppá seg verður ein tílík umlegging ódýr.

Víðari góðsking av fiski

Sæð burtur frá telmum royndum, ið nú verða framdar í samband við góðsking av svartkjafti og tað hesar royndir vónandi, sum frá líður koma at skapa av nýggjum virksemi á landi, er tað serstakliga *roykivirkini*, ið størsti áhugin er knýttur at í løtuni. Umframt tey tvey virkini (Havn og Klaksvík), sum eru í rakstri í dag, eru 3 nýggj í umbúnað (Funningsfirði, Porkeri og Sørvági). Marknaðarviðurskiftini fyri royktar fiskavørur — kvalitetsvørur — eru stabil og góð, so vánirnar á hesum øki skuldi verið ljósar, bert vit megna hetta trupla kynstur.

Góðsking av slógvi, garnum og idnaðarfiski til ensilagu og lutvís víðari til proteinkonsentrat og feitt er ein idnaður í skjótari menning kring allan heimin. Áhugin millum manna at byrja á hesum øki er tíbetur eisini stórur hjá okkum, og kunnu vit helst longu í næstu framtíð vænta munandi broytingar við minkandi fiskamjølsframleiðslu og tilsvarandi vaksandi framleiðslu av ensilagu og proteinkonsentrat. Framleiðslan verður nýtt sum fóður til laksa- og sílaaling, kraftfóður, minkafóður og annars til sama marknað sum fiskamjøl.

Framleiðsla av ensilagu og proteinkonsentrat er uppá seg fleiri ferðir minni orku krevjandi enn fiskamjølsframleiðsla.

Aling — Havbúnaður

Ovurframleiðsla av aldum sílum og laksi hevur skapt stóra niðurgongd (20-30%) í prísinum á hesum fiskasløgum, og eftir hvat frættist úr Noreg, er líkt til at prísirnir neyvan fara upp aftur í bræði — í hvussu so er ikki uppá somu legu sum áður. Samstundis er fóðurprísurin (at siga alt fóðrið, vit brúka, verður innflutt) vaksandi, so samanumtikið eru vánirnar fyri hesa vinnugrein heldur daprar í løtuni.

Neyðugt verður tí helst at sýna eitt ávíst varsemi í samband við veitan av nýggjum laksaalileyvum og heldur royna at fremja smolt- og fóðurframleiðslunu, so vit í hvussu so er verða sjálvbjargnir á hesum øki.

Eru vánirnar í løtuni heldur daprar fyri laksa- og sílaaling, eru tær tess betri fyri aldan krækling og ostru.

2 størri kræklingaverkætlanir (í Funningsfirði og Kaldbaksfirði) eru komnar væl áleiðis, og mett verður, at tey fyrstu 100-150 tonsini av føroyskt aldum kræklingi verða marknaðarlørd innan 2 ár.

Í samstarvi við Havbúnaðarfelagið hevur Ídnaðarstovan tikið stig til fremjan av royndum at ala ostru í føroyskum sjógvi.

Royndarfiskiskapur eftir goggu til matna (M/s Plankton) bendir á, at vit her hava eitt tilfeingi (ressours), sum kann troytast lønandi.

Samanumtikið: Vinnuvánirnar fyri skeljafisk eru góðar og eigur vinnan at prioriterast.

3.4. Know-how ídnaður knýttur at menningarhjálp

Fyrstu stigini á hesum áhugaverda øki eru sum kunnugt longu tikin. Enn er tó ov tíðliga at meta um vánirnar her, men fara framtøkini at eydnast bert so toluliga, er eingi at ivast í, at henda nýggja vinnugrein verður at stimbra føroyska vinnulívið í sini heild so tað munar.

Í løtuni fara fram samráðingar um føroyska luttøku í einari fiskivinnuverkætlan, ið Danida hevur um hendi í Angola.

4. Støðan í dag

Høgu orkuprísirnir, uppá seg stóra rentuinntøkuna og tað at fólk yvirhøvur eru vorðin meira prísansin, eru nakrar av orsøkunum til, at føroyski ídnaðurin — og tá fremst hann, ið er grundaður í heimamarknaðin — í dag hevur ávísar likviditetstrupulleikar.

Uttan at hava konkret tøl at vísa á, verður tó mett, at hesir trupulleikar ikki eru verri enn, at vinnast kann á teimum, um spádómur búskapafrøðinga um betri tíðir aftur frá 1982 gongur út.

Skulu vit hava sama býtið innan tey ymisku vinnuøkini sum higartil (og einki bendir móti, at vit ikki skulu gera tað), skal sum nevnt helmingurin av fólkinum í vinnu arbeiða innan tað framleiðandi vinnulívið.

Við einum fólkavøkstri uppá 1,2% um árið, verður tí kravið til nýggj arbeiðspláss innan ídnað, handverk og tænastuídnað o.u. 200 um árið, ella 2.000 fram til 1991.

Ídnaðarfelagið/-stovan hevur gjørt eina metan av einum møguligum býti av hesum neyðugu arbeiðsplássunum.

Metanin er áhugaverd, tess meira sum tað er vinnan sjálv, ið her vísir á nýggjar framtaksleiðir. Metanin er hendan:

Vinnuøki	Nýggj arbeiðspláss fram til 1991
Verandi fiskiídnaður, víðkanir	250
Víðari góðsking av fiski	400
Aling, skeljadjóravinna	150
Ídnaður knýttur at landbúnaðinum	150
Know-how ídnaður - menningarhjálp	300
Fiskireiðskapsídnaður	150
Byggiídnaður	100
Mek. ídnaður	100
Klædnaídnaður	100
Alternativ orka (t.d. vindmyllur)	100
Heimaídnaður	50
Nýggj framleiðsla	150
Tilsamans	2.000

5. Úrskurður

Barnaskógvar ídnaðarins eru útgingnir. 80-ini verða at vísa, um »barnið« varð rætt uppalt. Møguleikarnir eru góðir og frá almennari síðu eru figgjarspurningarnir yvirhøvur loystir.

Eftir er tó m.a. at loysa toll- og skattaspurningin og spurningin um stovnsetan av Menningarstovuni.

— — og ikki at gloyma: — Finna fram á røttu kombinatiónirnar av »finna-uppá« og »passa-uppá« menniskju.

FØROYA IÐNAÐARGRUNNUR

E 2

Tann 27. juli 1981

Roknskapurin fyri árið 1980/81 er ikki komin frá grannskoðaranum.

Í roknskaparárinum 1980/81 hevur grunnurin fingið 44 umsóknir um lán.

Í árinum vóru 46 lán játtað uppá kr. 14.651.000,-.

Av hesum vóru 27 komnar í árinum meðan 19 vóru komnar áðrenn 1. apríl 1980.

13 umsóknir vóru ikki játtaðar, 2 vóru aftureiknar, og 5 vóru ikki liðugt avgreiddar.

Tann 30. mars 1981 hevur grunnurin játtað alt 125 lán uppá tilsamans 81 milj. krónur.

Í roknskaparárinum eru 24 nýggj lán útgoldin uppá tilsamans kr. 14.100.000,-.

Grunnurin hevur higartil útgoldið í lánum 51 milj. krónur, og tann 31. mars 1981 vóru útlán grunnsins kr. 43.269.000,-.

Játtað ikki útgoldin lán vóru umleið 28 milj. krónur og óavgreiddar umsóknir uppá 7,2 milj. krónur.

Grunnurin sum frammanundan hevur lán frá Íleggingargrunninum fyri Føroyar og frá Íleggingargrunni Iðnaðarins tók í februar 1981 eitt útlendskt lán uppá umleið 28,4 milj. krónur.

Eginogn grunnsins er umleið 15 milj. krónur.

Lántørvur grunnsins er millum 15 og 20 miljónir kr. um árið.

Notat 27.7.1981

Landbúnaðarmál:

Á figgjarlógini fyri 1981/82 eru iløgurnar í landbúnaðin vaksnar, t.d. er stuðningurin til mjólkaframleiðslu økstur úr 2,2 mió. kr. upp í 4,8 mió. kr.

Jarðagrunnurin hevur fingið eina lánsheimild uppá 15 mió. kr. í hesum figgjarári. Hetta var neyðugt til tess at teir garðar, ið eru byrjaðir av nýggjum kunnu fáa tann kapital, ið neyðugur er til fjósbyggingar, amboð og nýdyrkingar, soleiðis at sum mest kann fáast burturúr og á tann hátt fáa endarnar at røkka saman.

Royndarstøðin er undir projektering.

Fyri at betra um mjólkaframleiðsluna og har við dygdina eru fleiri kølitangar fingnir til vega. Eisini er Heilsufrøðiliga Starvsstovan byrjað at kanna mjólkina til tess at fáa eina betri góðsku.

Føroya Jarðarráð
3800 Tórshavn

1981/011

15. juli 1981

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

(avrit sent Hagdeildini)

Í fíggjarárinum 1980/81 varð útgoldið sum:

langfreistað lán (fjós)	kr. 4,7 mill.
stuttfreistað lán (seyðahús, maskinur, hegn, rakstrarlán o.a.)	kr. 4,5 mill.
Útgoldnar vørðu av festikonto	kr. 1,9 mill.
Aftrat varð játtað tilsøgn við fyribils figging um banka	kr. 5,0 mill.
Samlaða figgingin av íløgum var í 1980/81 sostatt um	kr. 16 mill.

Tann stóra luttøkan í figgingini fordi við sær, at ráðið fyribils noyddist at steðga fleiri útbyggingum seinna figgjarhálvárið.

Umframt inntøku grunnsins (rentur og avdráttur, jarðarsøla, játtan á figgjarløgtingslógini) tók grunnurin kr. 3 mill. í láni frá lánistovnum í Føroyum.

Fyri at tey tiltøk, sum voru í gerð kundu halda fram, og framhaldandi kundi farast undir nýggj, fekk ráðið við løgtingslóg nr. 25 frá 5. mai 1981 heimild til at taka upp nýggj lán við landskassaveðhaldi upp til 15 mill. kr.

Umsóknirnar um lán í figgjarárinum eru ikki endaliga viðgjørdar, men eru tær pr. 1/7-1981 uppá 19,0 mill. kr., sum býta seg soleiðis:

28 fjós (nýgerð og umbygging)	kostnaður:	kr. 10,5 mill.
39 seyðahús	—	kr. 3,5 mill.
44 maskinamboð	—	kr. 2,3 mill.
54 kølitangar	—	kr. 0,9 mill.
24 hegn o.t.	—	kr. 0,6 mill.
20 uppdyrking	—	kr. 0,5 mill.
12 ymiskt (rakstrarlán o.a.)	—	kr. 0,7 mill.
ialt		kr. 19,0 mill.

Hvørja ávirkan ileggingarnar í fjós og uppdyrking seinnu árini hava havt á framleiðsluna sæst av mjólkamongdini, ið varð innvegað til mjólkavirkini.

Í 1978/79	2.345.000 kg
Í 1979/80	2.501.000 kg.
Í 1980/81	3.196.000 kg.
apríl-juni 1980	816.000 kg.
apríl-juni 1981	930.000 kg.

Uppseting av køliútgerð í fjósunum, sum nú er um at vera liðug, er ein fyritreyt fyri at mjólkin lýkur góðskukrøvini.

Studningartnir um løgtingsfiggjarlógina eru til:

Mjólka- og neytaframleiðslu
nýdyrking o.a.
súrhoyggjabrunnar
húsdjóraaling

Mett verður, at við verandi studningsupphæddum, at játtanirnar fara at røkka í figgjarárinum, uttan játtanin til súrhoyggjabrunnar og rentustudningurin, sum uttan iva fara at vera ov smáir.

J.v.
Jóannes Dalsgarð, sign.

Notat 27.7.1981 Gl

Samferðslumál.

Hin nógv umstridda millumlandasiglingin kom inn í eini nýggja fasu í februar mánaða, tá ið vetrarsiglingin við »Smyrli« varð steðgað. Eftir at hava kannað og sæð, at hon hevði eitt halt uppá millum 1,5 og 2 milliónir krónur um mánaðin umframt rentur og avdrátt, og eftir at hava havt fundir við Skipaferðslunevndina um verandi og møguliga komandi vetrarsigling, varð avgerðin tikin um at steðga siglingini, í hvussu er fyribils.

Síðan hava kanningar farið fram bæði frá almennari og privatari síðu um hesa sigling uttan at vera komin til nakað endaligt úrslit enn. Hesar kanningar og møguligar loysnir verða at siggja í samband við tað svar, sum landsstýrið skal geva Norðurlandaráðnum í september í ár.

Annars hevur verið roynt at spara uppá útreiðslurnar hjá Strandferðsluni, m.a. við at skera túrarnar hjá »Teistanum« til Klaksvíkar og Vágs niður til tvær ferðir um vikuna. Fyri m.a. at hjálpa uppá sambandið til sunnaru helvt av Suðuroynni er fingin ein fyribils avtala við bilførarar har suðuri um at tryggja fólki í øllum bygdunum í Suðuroynni flutning til og frá »Teistanum«. Hetta er eisini gjørt fyri at kanna, hvussu nógv ein slík skipan kostar, tí ætlanin er at halda fram soleiðis, at allar bygdir í Føroyum hava regluligt ferðasamband.

Vit hava regluligt ferðasamband við bussum á nøkrum økjum, sum hevur koyrt eina tíð. Nú kann helst siggjast um hesin flutningur nøktar tann tørv, ið hann skuldi, ella hann kanska er óneyðuga ríkiligur.

Ein onnur kanning av flutningi í ár er helikoptaraflúgvingin, sum er fingin í lag í summar. Tað vil vísa seg, hvussu reglulig hon kann vera, um fólk vilja nýta hana, og hvussu kostnaðarmikil hon verður. Higartil sær út til, at hetta er eitt gott tiltak. Um mett verður, at hesin flutningsháttur kann halda fram, verður sambandið við útoyggjarnar og smáplássini munandi betri.

Notat 27.7.1981

Vegir og havnir:

Orsakað av fíggjarvánunum var játtanin til vegir, serliga til nýgerð av vegum, nógv minni enn árini frammanundan. Tó var hildið áfram í flestum stoðum, men við eini minni peningaupphædd til taks (sí skjal).

Havnagerðirnar halda áfram eftir 6-ára havnaætlanini (sí skjal). Spurningurin um tann partin av gjaldinum, ið ríkið skal gjalda, er enn ikki loystur. Landsstýrið arbeiðir við hesum spurningi, og verður hann ivaleyst á skránni, tá ríkismálaráðharrin kemur higar at vitja í næsta mánað.

Yvirlit yvir arbeiði fram í tingárinum 1980/81

Vegabyggingar:

Suðuroy: Seinastu 600 m oman til Víkarbygis eru planeraðir, og nú er koyrandi oman i bygdina.

Vágar: Arbeiðið at umbyggja vegin frá Sørvági til Bíggjar hevur hildið fram, og er strekkið frá grótbrotinum í Sørvági til Breiðá — 1,6 km — liðugt, meðan strekkið frá Breiðá til Bíggjar — 1,0 km — er komið væl áleiðis. Samstundis er nakað gjørt við umkoyringina omanfyri Bø, og kann nú koyrast eftir hesi.

Streymoy: Arbeitt hevur verið við at gera vegin av Sundi til Kaldbaks lidnan, og er strekkið úr Kaldbaksbotni til Kaldbaks asfalterað.
Vegurin úr Fossdali móti Syðradali er planeraður góðar 2 km fram.
Strekkið á Vestmannavegnum frá Kráargili og oman á Fjørð er nú liðugt.
Umbyggingin av vegnum Hvalvík-Hósvíkar er liðug.

Eysturoy: Á Eiðisvegnum hevur verið arbeitt við at umbyggja omankoyringina til Eiðis.
Umbyggingin av vegnum millum Skála og Skálabotns hevur hildið áfram, og verður liðug í summar.

Norðoyggjar: Á Kallsoynni er tann triðji og seinasti tunnilin á leiðini til Mikladals skotin igjøgnum.
Eisini er vegur gjørdur omanfyri Mikladal, til har tunnilin til Trøllanesar skal byrja, og er komið nakað áleiðis við omankoyringini til Mikladals.
Á Fugloynni heldur vegagerðin millum Hattarvík og Kirkju áfram.

Heliports: Danska sjóverjan er farin yvir til nýtslu av nýggjum slag av helikoptara, sum bert kann lenda á plássi, sum er gjørt til endamálið.

Til tess framyvir at kunna nýta henda helikoptara í neyðsendarørindum var farið undir kanningar av, hvar tílík heliports kunnu verða gjørd.
Av teimum 14 heliport'unum, talan hevur verið um, eru farna árið bygd tvey, nevniliga eitt í Klaksvík og eitt í Froðba, og eru tey bæði útgjørd til at kunna verða nýtt um náttina, eins væl og um dag.

Fiskaaling:

4 feløg eru farin undir at ala laks og sil, og harafturat ger P/F Fiskaaling royndir við hesum fiskasløgum.
Áhugin fyri at fara undir fiskaaling er stórur, og 18 feløg ella einstaklingar hava søkt landsstýri um loyvi.
Ein týðandi táttur fiskaalingini eru smoltstøðirnar, og á hesum øki eru vitkomnir nóg so stuttir. Ein smoltstøð við Áir er komin væl áleiðis, og kann hon, tá ið hon er farin at virka, ala o.u. 100.000 smolt um árið. Arbeitt verður við ætlanum um at byggja eina smoltstøð afturat við Áir, og skal hon geva o.u. 500.000 smolt um árið og eina av líknandi støddd uppi á Sundi, har møguleiki er at fáa hita frá elverkinum.

Havnir og lendingar

Suðuroy:

Í **Lopra** er ein 140 m langur verjugarður lagdur út í sambandi við bátahavn.
Í **Vági** eru oljubryggja og bátahylur í gerð í Oyrunum.
Á **Tvøroyri** er bátahylur í gerð.
Í **Hvalba** er 125 m av atløgubryggju lidnir og eitt 5.000 m² stórt havnarøki gjørt byggibúgvið.

Skúvoy:

Arbeiðið í samband við gerð av lendingarvegi heldur áfram.

Sandoy:

Á **Sandi** heldur arbeiðið við leingjan av pierinum við grótkasti áfram.
Í **Skopun** er arbeiðið við dýping av havnini byrjað, og portur verður projekterað.

Koltur: Atløgusíðan verður longd við 5 m.

Vágar: Í **Sørvági** er leingingin av bryggjuni á Bakka liðug, og nakað av sandinum í bátahylinum verður pumpaður burtur.
Í **Miðvági** er bátahavnin liðug, og arbeiðið í sambandi við veg og grótkast á Prestlandinum heldur fram.
100 m atløgubryggja í Miðvágs/Sandavágs havn verður projekterað.
Í **Sandavági** er vegur á Giljanesi í gerð.

Streymoy: Í **Vestmanna** er havnavíðkanin vestureftir byrjað.
Í **Kvívík** eru ábøtur á lendingina og gerð av bátahyli byrjað.
Á **Argjum** er víðkan av bátahylinum í gerð.
Í **Hoyvík** og á **Hvítanesi** eru ábøtur á lendingarnar lidnar.
Í **Kollafirði** er 75 m leingjan av bryggjuni á Langasandi byrjað.
Í **Hvalvík** er 53 m bryggja til dekksfør liðug.
Í **Haldórsvík** er 300 m langur brimgarður í gerð.

Eysturoy: Á **Eiði** er brimgarðurin liðugur, og vegurin oman til bygdina er um at verða liðugur.
Við **Ljósá** er 1. byggistigið í sambandi við bátahavn liðugt.
Á **Strondum** og á **Selatrað** verður farið undir gera av bátalegum í næstum.
Á **Skála** eru 200 m av bryggju norðanfyri turrdokkina um at verða lindir, og bátahavnin er liðug.
Í **Søldarfirði** verða gjørdir 50 m av atløgusiðu.
Í **Runavík** er bryggjan norðanfyri høvuðspierin liðug.
Á **Toftum** er byggibúningin um flakavirkið liðug, og brimgarðurin sunnan fyri ferjuleguna er um at verða liðugur.
Í **Norðagøtu** er arbeiðið í sambandi við gerð av brimgarði, 90 m bryggju og dýping av havnarhylinum niður á 6,0 m um at verða liðugt.
Í **Fuglafirði** er skipa- og bátahavn í gerð.
Í **Oyndarfirði** verður gjørd dekksbátahavn.

Norðoyggjar: Í **Kunoy** er lendingarvegur í gerð.
Í **Klaksvík** er bryggjan á Vágsstongunum í gerð, og arbeiðið við umlegging av vegnum til Kósavirkið og regulering aftanfyri virkið er byrjað.

Arbeiðið við bryggju í bátahavnini í **Árnafirði** verður boðið út í næstum.

Í **Hvannasundi** verður parkeringsoki gjort við Sandoyrarbrúg.
Í **Hattarvík** er bakkin við lendingina í Trøllagjógv tryggjaður.

FT

ORKURÁÐIÐ
THE ENERGY COUNCIL
Tinganes, 3800 Tórshavn
FØROYAR
Faroe Islands
Telefon 11080

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn

Tygara ref.: FLj.nr. 1205-19 Okkara ref.: EE Tórshavn, hin 4. november 1980.

Ummæli av ætlaðu vatumegiútbyggingini hjá SEV í meginøkinum.

Í skrivi frá Landsstýrinum, dagfest 8. oktober 1979, var álagt orkuráðnum at ummæla 10-ára byggiætlanina hjá SEV.

Hetta var fyrsta uppgáva ið Landsstýrið álegði orkuráðnum, sum beinanvegin, eftir at hava skipað seg tann 17. oktober 1979, legði tilrættis mannagongdina í málinum.

Eftir at hava kannað tilfarið í samband við úthyggingarætlanina, sum millum annað umfatað eina í føroyskum máti ógvuliga umfatandi og kostnaðarmikla vatnmegiútbygging, varð gjørt av at býta kanningarnar upp í:

1. Vatnmegiútbyggingarætlanin í meginøkinum
2. Termisk el-útbygging
3. Samlaða 10-ára byggiætlanin hjá SEV.

Vit hava mett okkara uppgávu at verða:
– at gera eina tekniska og samfelagsbúskaparliga meting av 10-ára byggiætlanini hjá SEV.

Spurningurin viðvíkjandi møguligari **umhvørvisávirkan**, eigur eftir okkara metan at verða **lýstur av øðrum**.

Úrslitið av fyrsta parti í okkara arbeiði, nevniliga **ummælið av ætlaðu vatnmegiútbyggingini**, er nú liðugt og verður hjálagt handað Landsstýrinum.

Ráðið arbeiðir víðari við málinum og væntandi verður annar partur, ummælið av termiskari el-útbygging, liðugur um ein mánað.

Áðrenn endaliga ummæli av allari 10-ára byggiætlanini kann verða liðugt eru fleiri kanningar ið skulu gerast, men roknast kann við, at hetta arbeiðið verður liðugt um 3 mánaðar eftir at kanningarnar eru settar í verk.

Umframt ummælið av vatnmegiútbyggingini, er eisini hjálagt:

1. skjal VURDERING AF DE FORELIGGENDE PROSJEKTER FOR VIDERE VANNKRAFTUDBYGNING PÅ FÆRØYENE

2. skjal. UM ELORKU-ÚTBYGGING ÚR TERMISKARI MEGI OG UM NYTSLU AV AVLOPSHITA

3. skjal. SPURNINGAR TIL SEV Í SAMBAND VIÐ ÆTLAÐU VATNMEGI-ÚTBYGGINGINA Í EYSTUROY, STREYMOY OG VÁGUNUM

4. skjal. KOMMENTARER TIL SPØRGSMÅL FRA DET FÆRØSKE ENERGI-UDVALG I RELATION TIL UDBYGNINGSUNDERSØGELSER 1978/79.

Jóannes Hansen
formaðurin / Eyðfinn Egholm

Frágreiðing um virki orkuráðsins 1979/80

12

1. Setan av ráðnum.

Landsstýrið kallaði fyr fyrstu ferð ráðið saman, tann 16. oktober 1979, og limirnir í ráðnum vóru Elias Davidsen, Eyðgunn Egholm, Jóannes Hansen, allir verkfrøðingar, Árni Olafsson, hagfrøðingur og Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingur. Ráðið skipaði seg við Jóannes Hansen sum formanni og Eyðfinn Egholm sum næstformanni og fyribilsskrivara.

2. Reglugerð ráðsins.

Eftir § 7 í løgtingslóg nr. 48 frá 7. juni 1979 um orkuráð og orkugrunn, kunngjørdi Landsstýrið, tann 6. mai 1980, reglugerð fyri orkuráðið.

3. Uppgávur Landsstýrið hevur sent ráðnum.

3.1. 10-ára byggiætlanin hjá SEV.

Sama dag sum orkuráðið var kallað saman til sín fyrsta fund, varð 10-ára byggiætlanin hjá SEV handað ráðnum til ummælis.

Hetta var eitt eftir føroyskum máti ógvuliga umfatandi mál og kravdi eftir ráðsins meting gjølla viðgerð.

Skjótt varð greitt at tíðin, 1/2 ár, ið var sett av til hetta arbeiðið, als ikki var nóg mikið til at málið kundi fáa nóg góða viðgerð.

Tær kanningar ið skuldu gerast, vóru býttar upp í triggjar partar:

1. Vatnmegiútbyggingarætlanin í meginøkinum
2. Termisk el-útbygging
3. Samlaða 10-ára byggiætlanin hjá SEV

Ummælið av 1. parti varð sent Landsstýrinum tann 19/12-1980.

Arbeiðið er væl áleiðis viðvíkjandi 2. parti og áhaldandi kanningar verða neyðugar, fyri at endaliga ummæli kann gerast av samlaðu 10-ára byggiætlanini hjá SEV.

3.2. Felags ruskbrennistøð.

Eftir at ein landsstýrisnevnd hevði arbeitt við málinum viðvíkjandi eini felags ruskbrennistøð fyri alt landið, legði Landsstýrið, tann 18. mars 1980, spurningin um nýtslu av avlopshitanum fyri orkuráðið.

Seinast í juli mánað 1980 varð ummælið frá orkuráðnum sent Landsstýrinum.

3.3. Onnur mál frá Landsstýrinum.

Umframt hesi rættuliga umfatandi mál, hava onnur mál sum summartíð, kunngerð av avtalu um eina altjóða orkuskrá í Føroyum, uppskot til nevnd, ið skal kanna málið viðvikjandi elkaðal úr Íslandi til Føroyar og umsóknir um figgjarligan stuðul til orkusparandi endamál, verið send orkuráðnum til ummælis.

4. Kunningar sum eru og sum elga at verða settar í verk.

Orkuráðið sær tað sum ein týðandi part í sínum arbeiði, at fáa til vega ein haldgott baksýnistilfar at byggja á, tá avgerðir og tilráðingar skulu gerast framyvir.

Teir eftir okkara meting mest týðandi spurningar fyri okkara møguleikar at nýta varandi orkukeldur, eru fyrireikingar innan vatn og vindorku.

4.1. Vatnmátingar.

Í samband við tær kanningar ið eru gjørdar viðvíkjandi ætlaðu vatnmegiútbyggingini hjá SEV, gjørdist skjótt greitt at vatnmátingar í okkara áum vóru tilrongdar.

Eftir at hava greitt Landsstýrinum frá okkara sjónarmiðum og hvat kostnaðurin kom at verða fyri at seta tílíkar mátingar í verk, varð peningur, kr. 500.000,-, játtaður til endamálið.

Ætlanin varð síðan, við hjálp frá Norges Vassdrags- og Elektrisitetsvesen, Hydrologisk avdeling, sett í verk í september mánað 1980.

4.2. Vindmátingar.

Á sumrinum 1980 hevði orkuráðið vitjan av einum donskum elverksstjóra, sum er við í leiðsluni av teimum vindorkukanningum ið verða gjørdar fyri danska orkuministeriið.

Hesar kanningar fevna um royndir við tveimum 600 KW-myllum. Til samanbering kann sigast at Riisager-myllan á Tvøroyri er 55 KW.

Endamálið við hesi vitjan, var at gera hann kunnugan við lendið í Føroyum og okkara vindviðurskiftir, so at grundarlagið fyri at taka avgerð um møguliga at leggja vindorkuroyndir her, skuldi gerast betur.

Eyðsæð er, at skal vindorkan gerast ein týðandi táttur í okkara orkuskipan, verður neyðugt at gera royndir bæði við stórum og minni myllum, meu avgerandi neyðugt verður at gera vindmátingar áðrenn nakrar stórar myllur verða settar upp.

4.3. Vindmylluprojekt í Hesti.

Orkuráðið hevur í november 1980 havt fund við umboð fyri eitt vindmylluprojekt í Hesti og metir ráðið tað vera rættuliga góðir møguleikar at gera royndir við eini minni vindmyllu har.

4.4. Spillhiti og fjarhiti.

Í arbeiði ráðsins, við at gera eina ætlan fyri orkunýtslu/orkuframleiðslu, eru kanningar gjørdar viðvíkjandi:

— at framleiða elorku úr termiskari megi sum gass-olju, tungari olju og koli
— at nýta spillhitan frá verandi og framtíðar termiskum elverkum til upphitingarendamál

- at nýta orkuna frá eini fyri Føroyar felags ruskbrennistøð á ein búskaparligan og orkubúskaparligan hátt.

5. Undirvísing og upplýsing.

Saman við umboðum fyri undirvisarum (SIGMA), verður stilað fyri einum orkuskeiði í mars 1981.

Endamálið er at finna fram til á hvønn hátt orkumál kunnu samskipast við aðra undirvísing, sum t.d. støddfrøði, livfrøði, kunning og evnafrøði.

Eisini arbeiðir ráðið við á hvønn hátt tann almenna upplýsingin eigur og kann fara fram.

6. Orkuráðsskrivstova og skrivari.

Eftir ábeitan frá ráðnum, góðkendi Landsstýrið í februar 1980, at húsini hjá Føroya Forngripafelag, sum standa í Hornabø, verða leigað til skrivstovuhølir hjá orkuráðnum.

Ráðið hevur síðan byrjan arbeitt við einum av ráðslimunum sum fyribilsskrivara, men hevur Landsstýrið í december 1980, eftir ynski frá orkuráðnum, sett skrivara í heildagsstarv.

7. Arbeiðsætlan fyri árið 1980/81.

1. Gera uppskot til orkupolitikkin í Føroyum.

2. Kanna orkunýtsluna hjá okkara fiski- og flutningsførum og koma við uppskotum til skynsama orkunýtslu.

3. Fáa greiða á hvussu orkunýtslan er í ymiskum pørtum av samfelagnum sum sethús, handilshús, idnað, verksmiðjur o.s.fr.

4. Seta í verk vindmátingar og arbeiða víðari við at fáa vindorkuroyndir við stórum myllum lagdar í Føroyum.

5. Fáa til vega tilfar, ið skal nýtast til upplýsing viðvíkjandi orkusparing og skila góðum orkubúskapi.

6. Gera eina skrá fyri upphitingarmøguleikar og tørv í Føroyum.

7. Gera kreppuætlan fyri orkunýtsluna á sjógvi og landi.

Jóannes Hansen
formaður

/

Eyðfinnur Egholm

13
ORKURÁDID
THE ENERGY COUNCIL
J.C. Svabosgota 35
3800 Tórshavn
Foroyar (Faroe Islands)
Telefon 16258

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn

Tygara ref.: Okkara ref.: JH/sj Tórshavn, hin 13. apríl 1981

Viðvíkjandi 10 ára útbyggingarætlanini hjá SEV.

Diesel-verk

Orkuráðið viðger í hesum døgum 10 ára útbyggingarætlanina hjá SEV viðvíkjandi diesel-verkum og el-býtisskipan.

Eitt grundarsjónarmið hjá Orkuráðnum er, at sum mest av framleiddari orku, tað veri seg beinleiðis framleidd orka ella sokalla spillorka, verður nýtt til samfelagsgagnlig endamál.

Fyri at nakað munandi skal koma burtur úr, metir ráðið, at neyðugt verður við reglugerðum og øðrum tiltøkum í sambandi við virkir og einstaklingar ið nýta ella framleiða yvir eitt ávist mark av orku.

Eitt tað fyrsta mál støða má takast til, í samband við el-framleiðslu, er hvar termisk grundlastverk skulu byggjast.

Út frá omanfyri nevndu sjónarmiðum, metir Orkuráðið tað vera av landsbúkaparligum týdningi, at termisk verk verða bygd so at spillhitin kann verða nýttur á staðnum ella nærindis. Tað er jú lættari og undir øllum umstøðum neyðugt at flyta elorkuna frá framleiðsluøkinum.

Hetta merkir at neyðugt verður í hvørjum einstøkum føri at kanna, hvørjir møguleikar eru at samskipa el framleiðslu og nýtslu av avlopshitanum.

Fortreytir, ið vit meta eiga at vera til staðar har nýggj verk skulu byggjast, eru eitt ella fleiri av niðanfyri nevndu:

— at bygt verður í samband við idnaðarøkir, har roknast kann við stórum hitaorkutørvi í sambandi við framleiðslu, upphiting v.m.

— at bygt verður so at spillhitin kann nýtast til fiskaaling, og er hetta aftur treytað av, at nóg mikið av feskvatni er á staðnum.
Her kann hugsast, at rættast er, at samskipa termiska útbygging við vatnmegiútbygging:

— at bygt verður soleiðis, at avlopshitin kann nýtast í eini fjarhitaskipan.

Fyri at lýsa hvønn búskaparligan týdning spillhitin kann fáa, skal verða upplýst, at avlopshitin frá termiskum verkum í Suðuroy í dag svarar til um 880 tons av olju, og treytað av um avlopshitin kann avloysa gassolju- ella tungolju (1599 Rsec) nýtslu, er virðið 2,2/1,6 milj. kr. Taka vit allar Føroyar, er virðið av samlaða spillhitanum í dag um 21/15 milj. kr.

Orkuráðið hevur tá fatan, at áskoðanin hjá SEV hipartil hevur verið, at termisk grundlastverk, í so stóran mun sum gjørligt, skulu samlast á einum stað, og er hetta helst grundað á lægri umsitingarútreiðslur, ið standast av tílíkari centralisering.

Eyðsæð er, at ein tílík áskoðan er búskaparliga rølt fyri SEV, um teir ongan møguleika siggja at fáa inntøkur av spillhitanum, men samfelagsbúskaparliga eigur hesin spillhitin at verða nýttur.

Orkuráðið mælir til, at landsstýrið heitir á SEV um at geva eina frágreiðing, sum vísir á, hvørjir møguleikar eru at nýta spillhitan frá verandi og teimum ætlaðu dieselverkunum í Klaksvík, Suðuroy og á Sundi. Eisini eigur ein tílík frágreiðing at fevna um eina búskaparliga meting um, hvør best egnaða ætleggsroddin er á hvørjum stað, tá hugsað verður um at nýta spillhitan.

Sum dømi kunnu vit nevna fiskamjølsvirkið í Fuglafirði, ið nýtir 5 6000 tons av tungolju árliga, og í hesum sambandi kann eisini verða sagt, at ein 6 MW-motorur við 4500 driftstimum pr. ár framleiðir spillhita ið svarar til um 2200 tons av olju pr. ár.

Virðingarmest
O.r.v.
J. Hansen
formaður

27/7-1981 — Notat.

J 1

Kommunumál.

Stórt byggivirksemi fer í løtuni fram í flest øllum teim størru kommununum. Hetta hevur ført við sær lántøku bæði innan- og uttanlands og gjørt sitt til, at fleiri kommunur eru komnar at dragast við tungan rakstur. Hartil kemur, at ávísar kommunur eru komnar rættuliga illa fyri við tað, at studningurin frá rikisstýrinum, sum var væntandi sambært løgtingslóg um 6 ára ætlan fyri útbyggjan av havnum, frá 23. juni 1978, í ongum føri er komin til gjaldingar. Landsstýrið arbeiðir framvegis við at fáa eina loysn í hesum máli.

Við tí fyri eyga, m.a. at broyta býtið av inntøku og ábyrgd millum land og kommunur, so kommunurnar fúa ein lutfalsliga størri part av skattligu inntøkunum

og stórri avgerðarrætt í kommunalum spurningum, hevur landsstýrið avgjørt at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá Kommunufelagnum, Tórshavnar kommunu og umsitingini. Uppskot um broytingar í Kommunulógini, sambært tað omanfyri nevnda, verður væntuliga lagt fyri tingið í hesi tingsetuni.

Stóra felagskommunala tiltakið ruskbrennistøðin, sum ætlanin er at byggja á Høganesi í Eysturoy, er nú komið so langt, at arbeiðið partvis er boðið út. Brennistøðin er mett at kosta 29,8 mió. kr. í 1980-prísum og skal vera liðug um 2 ár. Tingið samtykti í vár at veita veðhald fyri neyðugum láni til byggingina.

K t

Notat. 20.juli 1981

Telefonverkið.

Á Grækarismessu í fjør fekk telefonverkið byggiloyvi til nýggju støðina í Havn. Arbeiðið varð sett í verk við tað sama og 1. november 1980 var byggiarbeiðið komið so væl álegiðis, at montasjan av nýggju støðini kundi byrja.

Nýggja automatstøðin varð tikin í nýtslu 25. juni í ár. Samstundis varð gamla automatstøðin, ið varð sett til 1. mai 1953, tikin úr nýtslu. Henda umlegging er av sínum slag ein tann størsta sum er framd ikki einans í Føroyum, men í danska ríkinum sum heild. Tað er eyðsæð, at byrjunartrupulleikar standast av hesum. Telefonverkið metir, at flest allar barnasjúkur eru burtur í september mánað, men longu nú kann sigast, at tá ið alt koyrir lítaleyst, tá vera eingir trupulleikar hvat viðvikir kapaciteti.

Til heystar kunnu felagarnir í Havn fáa tastaturtelefonir. Hetta fyribrigdið gerst eisini veruleiki úti á bygdunum um eitt árs tíð. Tó skal viðmerkjast, at Klaksvíkin longu fyri ári síðani eisini fekk tastaturtelefonir.

Í Havn eru umleið 500, ið bíða eftir at fáa telefon. Tá ið summarfrítíðin er av, verður øll orka sett inn á at ganga hesum umsóknunum á møti.

Hvat rakstrinum viðvikir er ársrokningskapurin fyri 1980/81 enn ikki endaliga uppgjørdur, men longu nú kann sigast, at talan verður um eitt halt uppá 2,5 - 3 milj. kr. aftaná goldnar rentur og avskrivingar. Hallið stavar serliga frá øktum fíggjarútreiðslum vegna tann nógv hækkaða dollaran. Helst eru møguleikar fyri, at nýggja automatstøðin í Havn verður orsøk til munandi størri inntøkur soleiðis, at hesar kunnu viga upp í móti hækkaða dollarvirðinum. Hvussu fer at vignast fæst greiði á um árslok.

S. Jacobsen
TELEFONVERK
FØROYA LØGTINGS

27/7-1981 -- Notat. L. t

Skúlamál.

Í vár samtykti løgtingið at veita stuðul til bygging av deild Føroya Handilsskúla í Tórshavn. Ætlanin er at bjóða arbeiðið av nýggja skúlanum við Marknagilsvegin út í næstu framtíð, so at farast kann undir byggingina í heyst.

Landsstýrið hevur heitt á stýrið fyri Føroya Maskinskúla um at skipa so fyri, at byggingin av nýggja maskinskúlanum kann fara í gongd so skjótt sum handilsskúlabyggingin er lokin og áðrenn Tekniski skúlin fer undir sína bygging.

Landsskúlafyrisitingin hevur sett nevnd at gera uppskot til undirvisingarinnihaldið í framtíðar handils-, skrivstovu- og fyrisitingarútbúgving. Hetta verður gjørt í sambandi við umlegging til dagskúlavundirvising á Føroya Handilsskúla, ið ætlandi fer at byggja í august 1983.

Landsskúlafyrisitingin setti í heyst eina nevnd til í samarbeiði við sitandi lesiætlanarnevnd fyri fólkaskúlan at koma við uppskoti um, hvussu útbúgvingarmynstrið eigur at vera, so at ungdómurin fær møguleika fyri einum skifti úr fólkaskúlanum og til framhaldandi útbúgving so væl hóskiliga sum møguligt bæði fyri tann einstaka og samfelagið.

Lista- og Handverkaskúlin á Sandi hevur í tvey ár verið rikin sum royndarskeið. Fyri at fáa grundarlag undir støðutakan til framtíð skúlans hevur landsskúlafyrisitingin eftir áheitan landsstýrisins sett eina nevnd at koma við eini tilráðing hesum viðvikjandi.

Landsskúlafyrisitingin hevur eftir áheitan landsstýrisins sett ein arbeiðsbólk at endurskoða og nútímansgera galdandi lærlingalóg.

Sum ein avleiðing av tí vaksandi næmingatilgongdini til Studentaskúlan og HF hevur landsskúlafyrisitingin mælt landsstýrinum til at umbyggja miðhæddina í »Gamla húsi« í Hoydølum til 5 skúlastovur og at umbyggja aðra ella báðar lærarafbúðirnar á dreingjadeildini til næmingarúm. Hetta arbeiðið er farið í gongd og ætlast at verða liðugt til skúlaársbyrjan.

Somuleiðis hevur landsskúlafyrisitingin mælt landsstýrinum til, at ein studentaskúli við HF-deild, sum bæði fyrisitingarliga og figgjarliga er óheftur av Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, verður settur á stovn í Eysturoy.

Til tess at seta ein sjálvstøðugan studentaskúla og HF-skeið á stovn krevst serlig lógarheimild, og fer landsstýrið tí at seta fram lógaruppskot hesum viðvikjandi.

Uppskot til fritiðarlóg verður greitt at leggja fyri tingið í hesi setuni.

Notat 27/7-1981. M 1

Meirlutin í ráðleggingarnevndini fyri Sjúkrahúsverk Føroya og minnilutin (Jóhan Simonsen, sáli) handaði landsstýrinum álit tann 1/8-1980.

Í meirilutauppskotinum er umrøtt uppskot til útbygging av sjúkrahúsunum í tíðarskeiðinum 1980-92.

Í tíðarskeiðinum 1980-84 er skotið upp, at innrættað verður ein barnadeild á Landssjúkrahúsinum.

Fyri tíðarskeiðið 1984-92 er umtalað um- og útbyggingar á øllum 3 sjúkrahúsunum.

Víðari er umrøtt arbeiðsbýti millum sjúkrahúsini, herundir setan av einari visitatiónsnevnd, og samstarvið við tey primeru heilsutænastu og ellis- og røktarheimini.

Álitini verða løgd fyri tingið í hesi setu.

Síðani seinastu løgmannsrøðu er felagsbyggingin millum Norðoya Ellis- og Røktarheim og Klaksvíkar sjúkrahús farin í gongd. Licitatión í samband við tað viðari arbeiði fer fram í august.

Ein skrivstovu- og goymslubygningur við Suðuroyar sjúkrahús er tikin í nýtslu og 3 hjálpartæknahús við Klaksvíkar Sjúkrahús eru liðugtgjørd.

Eldtrygdartiltøk við bygningi A (Drotning Alexandrines Hospital) á Landssjúkrahúsinum eru sett í gongd.

Landsstýrið hevur sett ein medicinskan yvirlækna við Klaksvíkar sjúkrahús og ein kirurgiskan yvirlækna við Suðuroyar sjúkrahús.

Til viðgerðar eru í løtuni spurningarnir um sjúkrahjálpara- og pleygiútbúgving í Føroyum, um útbygging av sjúkrasystraskúlanum og um nýtslu av deild 5 á psykiatrisku deild sum røktardeild.

Eitt stórt problem hjá sjúkrahúsunum er tað stóra talið av pleygusjúklingum, og nevnast má serliga tær ringu umstøðurnar á pleygudeildini á Landssjúkrahúsinum.

Innanríkisráðharrin og medisinalstjórin hava verið í Føroyum fyri at gera seg kunnugar við sjúkrahúsviðurskiftini.

Notat 27.7.1981. M 2

Tann primera heilsutænastan.

Tann primera heilsutænastan verður støðugt útbygd, jvnb. »betænkningen fra udvalget vedrørende kommunelægeordningen m.v. på Færøerne« frá 1973. Álitið,

ið hevur verið viðgjørt av løgtinginum, inniheldur uppskot um útbygging av kommunulæknaskipanini, uppskot til eina heimasjúkra- og heilsurøktarskipan og uppskot um broyting av jarðamøðraskipanini.

Útbyggingin av kommunulæknaskipanini umfatar m.a. eina øking av talinum av kommunulæknum og bygging av heilsumiðstøðum.

Sambært álitið skal talið av kommunulæknum økjast frá 16 til 23. Tað verður í løtuni umhugsað, um tørvur er fyri uppaftur fleiri kommunulæknastørvum.

Í farna ár er 2. kommunulæknin í Vágum og 5. kommunulæknin í Tórshavn settur, soleiðis at í løtuni eru settir 21 kommunulæknar.

Ein skipan við 23 læknum ger, at tað er ein kommunulækni fyri hvørjar 1850 íbúgvar.

Tað eru nú bygdar læknamiðstøðir á Sandi og í Suðuroyar sunnara læknadømi, tiknar í brúk ávikavist í december 1979 og í juni 1981. Miðstøðir eru í gerð í Tórshavn og í Vágum, og er ætlan um at byggja eina læknamiðstøð í Runavík.

Uppskotið í kommunulæknaálitinum um eina samskipan av heimasjúkra- og heilsurøktini er í ferð við at verða gjørd. Í løtuni eru samráðingar við Dansk Sygeplejeråd um sáttmálarnar, sum galda fyri hesi arbeiði. Vónir eru um, at skipanin, sum umfatar 27,5 størv ella 1 starv fyri hvørjar 1.500 íbúgvar, kann koma í gildi í ár. Nýskipanin ger, at allar kommunur í Føroyum fáa heimasjúkrasystra- og heilsurøktarskipan.

Viðvíkjandi broytingini av jarðamøðraskipanini hevur ein arbeiðsbólkur, settur av landsstýrinum, givið eitt álit til landsstýrið um jarðamøðraskipanina í framtíðini. Álitið verður nú viðgjørt í landsstýrinum.

Notat 17/7-1981 N 1

Almannamál

Arbeiðið við at hækka veitingarnar eftir sosialu pensiónslóggávuni og við at ajourføra forsorgarlógina og barnaforsorgarlógina fer at vera gjørt liðugt í næstum og verður síðani lagt fyri tingið. Hjálagt upprit frá Almannastovuni.

Ellis- og røktarheimini í Klaksvík og Runavík eru boðin út, og licitatión verður hildin um miðan august. Arbeiðini verða lokin á sumri í 1983, og tá verður væntandi klárt at fara undir bygging av røktarheimi í Suðurstreymoy.

Aðramáta verður arbeitt við at bøta um korini hjá teimum eldru og teimum brekaðu. Aðalmálið er, at tey kunnu vera búgvandi heima so leingi sum møguligt ella so nær sínum heimliga umhvørvi, at tey ikki missa kontaktina við sítt og sini. Í

hesum sambandi verður umhugsað, hvussu landsstýrið saman við kommununum kann finna fram til eina loysn, sum bæði hevur fyrilit við ti menniskjansliga tørvinum og sum eisini kann nøkta so nógv sum gjørligt av teimum ynskjum, sum tær einstøku kommununar hava.

Heimahjálparskipanin veitir nú hjálp í 732 heimum um alt landið, og skipanin verður framvegis útbygd, so at hon kann virka so gagnliga sum gjørligt fyri tey, sum tørva hana.

Arbeitt verður viðari við at skipa Endurbúgvingarstovnin eftir teimum sjónarmiðum, ið sett vóru fram í áliti frá endurbúgvingarnevndini. Samráðingar hava verið um eina reglugerð fyri stovnin, eins og samráðingar hava verið við Alv um samvinnu.

Í fjør samtykti løgtingið keypið av loftunstøðini í Vági. Landsstýrisins ætlan var at nýta ein part av bygningunum til eitt sjálveigandi vistarheim. Tað formliga viðvíkjandi keypinum er í hesum døgum um at vera greitt, og farið verður síðani undir tær neyðugu umbyggingarætlanirnar, soleiðis at eini 8-10 fólk kunnu vera búgvandi, og at haraftrat kann vera talan um umlætting í dagtimunum fyri fólk, sum búgva heima. Í Klaksvík verður eisini arbeitt við ætlanum fyri at gera eitt vistarheim har á staðnum. Eini hóskandi hús eru fingin til vega til endamálið.

N 2

ALMANNASTOVAN
JÓNAS BRONCKSGØTA 27
3800 Tórshavn. Tlf. 1 5480

Tann 20. februar 1981
J.nr. 90-60
(at tiskila í svari)

UPPRIT

viðvíkjandi broytingum í almannalóggávuni.

1. Inngangur: Í hesum uppriti eru frágreiðingar um gongdina og støðuna í málinum um pensiónslógina og forsorgarlógina.

2. Pensiónslóggávan. 2.1. Hetta mál byrjaði við skriv landsstýrisins frá 27. januar 1978 til almannamálaráðið. Skrivið miðaði eisini ímóti eini nýskipan í lóggávuháttinum í ti, at skotið varð upp, at uppskot til broytingar í føroysku lógunum skuldu fylgjast við uppskotunum til broytingar í donsku lógunum.

Almannamálaráðið tók ikki undir við hesum bugskoti. Annars er at bava í huga at uppskotið til broytingar í Danmark, sum lá fyri, síðani varð sera munandi broytt.

Á nevndarfundi í 1978 var avrátt, at Almannastovan skuldi gera ymiskar útroknингar, serliga viðvíkjandi »disponibelt beløb«, ið er tað, sum pensiónisturin hevur eftir, tá skatturin av pensiónini er goldin. Hesar upplýsingar vóru givnir av Almannastovuni í skrivi og »Notat« dagfest 21. august 1978.

Í skrivi dagfest 29. januar 1979 bað almannamálaráðið um fleiri upplýsingar. Í »Notat« dagfest 22. mai 1980 gjørdi Almannastovan útrokningar viðvíkjandi ajourføring og gav í »Notat« dagfest 28. mai 1980 tær umbidnu upplýsingarnar.

Á nevndarfundi tann 4. og 6. juni 1980 var málið umrøtt, og avrátt varð, at almannamálaráðið skuldi gera uppskot.

Í august 1980 kom fram »Notat« dagfest 23. juli 1980 frá almannamálaráðnum, og í tveimum »Notat« dagfest 5. september 1980 og 9. september 1980 setti Almannastovan fram viðmerkingar.

Til nevndarfundirnar 30. september og 1. oktober 1980 vóru býtt út tvey »Notat« dagfest 22. september 1980 og 25. september 1980 frá almannamálaráðnum, umframt tvey upprit (»Boligtillæg« og »Model 5«) frá Almannastovuni. Málið var til drúgva viðgerð, og teir dousku luttakararnir komu við ti boði frá hægri myndugleikum, at meirútreiðslan hjá ríkinum ikki kundi fara upp um 9. mill. kr. árliga (18 mill. kr. tilsamans). Tingingarnar vóru tí mest um, hvussu hesar skuldu býtast (eftir ymiskum »modellum«) millum pensiónsviðbót, grundarupphædd og — eins og í Danmark — byrjandi »javnstilling« av hjúnum og støkum (at hjún tilsamans fáa meira enn 1 1/2 ferðir upphæddina fyri støk).

Orðaskiftið varð ró tarnað av tørvandi hagfrøðiligum upplýsingum og avrátt var, at Almannastovan skuldi royna at útvega hesar, og at Almannamálaráðið tá skuldi seta fram nýtt uppskot.

Hesar upplýsingar vóru sendar frá Almannastovuni tann 3. november 1980. Hereftir setti almannamálaráðið í brævi dagfest 5. december 1980 fram »endaligt« uppskot. Hetta er formað sum persónligt brævi til almannastjóran, og er hetta helst tí, at Almannamálaráðið var í iva um framferðarháttin, tá landsstýrisskifti var um at verða.

2.2. Støðan nú er so tann, at almannamálaráðið hevur sett fram uppskot um, at upphæddirnar fyri grundarupphædd og pensiónsviðbót fyri støk verða ajourførdar — hækkaðar — til somu upphæddir sum í Danmark pr. 1. januar 1979, og at somu upphæddir fyri hjún verða hækkaðar til 150% av upphæddunum fyri støk.

Hetta ber í sær, at byrjað verður ikki við javnstilling millum hjún og støk, og eisini ber tað í sær, at avlamisviðbót, óarbeiðsførisviðbót, røktarviðbót og hjálparviðbót verða ikki — sum annars síður hevur verið — hækkaðar.

Almannamálaráðið hevur (á dýrtíðargrundarlagnum pr. 1. januar 1980) roknað meirútreiðslurnar út til stakar 18,0 mill. kr. árliga, harav ríkiskassin rindar um 8,7 mill kr. og Føroyar um 9,3 mill. kr., harav verður mett, at 8,3 mill. kr. verða goldnar av landskassanum og 1,0 mill. kr. av kommununum.

Almannamálaráðið hevur roknað út, hvussu stór ársfólkapensiónin fyri 1981 hevði verið fyri støk og hjún, um uppskotið hevði verið í gildi alt árið og undir ávisum fyritreytum viðvíkjandi pristalshækkingum.

Almannastovan hevur roknað samsvarandi tøl út (á sama hátt sum pristalsjavningin pr. 1. januar 1980) undir somu fyritreytum.

	Verandi lóg	Uppskotið	Hækking kr.	%
Árspensión fyri støk	26.244	30.345	4.101	15.6
Árspensión fyri hjún	38.337	45.534	7.197	18.8

Almannamálaráðið tekur fyrivarni fyri, at uppskotið ikki er lagt fyri ráðharran sjálvan og ikki fyri figgjarmálaráðið. Almannastovan metir, at hetta ber ikki í sær álvarsligan vanda fyri uppskotið.

Almannastovan mælir til, at landsstýrið tekur av uppskotinum (ella tilboðnum).

2.3. Serliga um barnagjøld v.m. Vanliga barnagjaldi (»Normalbidraget«) er um 3% hægri í Danmark enn í Føroyum.

Barnaviðbøtur til pensiónir v.m. eru sambært lógina á somu hædd sum vanlig barnagjøld.

Tí skal havast í huga, at formligt uppskot um broyting í lógini um barnagjøld v.m. skal setast fram saman við uppskotinum um broytingar í pensiónslógunum.

2.4. Serliga um húsaútreiðslur.

Av fyrstan tíð varð frá føroyskari síðu skotið upp, at aftrat hækkingunum annars, skuldi vera heimild at veita serligt uppískoyti vegna húsaútreiðslur.

Hvat lógini viðvíkir, varð hetta uppskotið háttað so, at heimild skuldi vera at veita persónligt iskoyti til húsaútreiðslur eftir reglum ásettar av landsstýrinum útum tað mark, sum annars er fyri persónligar viðbøtur (4% av útgoldnum grundarupphæddum árið fyri).

Endamálið skuldi vera at javna út tann stóra munin, sum er millum pensiónistar viðvíkjandi húsaútreiðslum. Við tí fyri eyga hevur verið hugsað um eina skipan, sum í høvuðsheitum gongur út uppá, at húsaútreiðslurnar verða gjørdar upp og eru hesar serliga rentur og avdráttir og húsabrunatrygging í egnum húsum ella húsaleiga. Opin spurningur er, um brennútreiðslur skulu íroknast. Ásett verður ein upphædd — í krónum ella sum prosentpartur av pensiónini — sum pensiónisturin sjálvur skal gjalda. Húsaútreiðslur omanfyri hetta mark verða so veittar sum persónlig viðbót til pensiónina, møguliga móti veðhaldi (vegna avdráttinum). Um hús hjá pensiónisti tørvar størri ábøtur, verður viðkomandi vístur til at taka lán og so rokna út sum frammanfyri nevnt.

Slik skipan verður torfør og arbeiðskrevjandi at umsita.

Nakað liknandi er galdandi í Danmark og kallast »Boligydelse«, men eru reglurnar sera umfatandi og greiniligar og bæði óbóskandi og ónýtiligar fyri føroysk viðurskifti.

Hetta er dottið burtur í seinasta uppskotinum og er orsøkin helst, at almannamálaráðið er sera ivandi við slíka skipan. Tó hvussu so er, ber til at rokna við, at tey einki vilja hava at gera við uppírokning av brennútreiðslum. Harafrat kemur, at »boligydelse« sum málsøki nýliga er farið frá almannamálaráðnum til íbúðarmálaráðið.

Tí eigur helst at verða umhugsað at veita íbúðarstudning sum føroysk veiting burturav, eins og uppiskoytisveiting til einkjur og brennistudningin.

Ein millumloysn kundi hugsast á fylgjandi hátt: Persónlig viðbót verður veitt eftir frammanfyri nevnda hugskoti og um persónligar viðbøtur tilsamans (fyri húsaútreiðslur og annars) fara út um markið, verður tað frestandi sum so verður at roknað sum íbúðariskoyti — goldið av landskassanum burturav.

Í løtuni verða langt frá veittar persónligar viðbøtur upp til markið, men eigur at roknast við hægri viðbótum í næstu framtíð, bæði vanliga vegna ræktartorv og vegna heilivág og hjálparamboð.

3. Forsorgarlógin:

3.1. Málið var av fyrstan tið nevnt mál um »Færøsk bistandslov«, men seinni er vorðin semja um, at broytingin skal umfata broytingar í føroysku forsorgarlógini.

Málið byrjaði við skrivi dagfest 14. august 1978 frá Almannastovuni.

Á nevndarfundi í september 1979 var semja um at bíða eftir nærri frágreiðing frá Almannastovuni.

Á nevndarfundum 4. og 6. juni 1980 var málið uppafturtikið, men varð á vitjan almannastjórans í Keypmannahavn í august 1980 avrátt, at almannamálaráðið í staðin skuldi seta fram uppskot í lógarsniði.

Við skrivi dagfest 18. september 1980 sendi almannamálaráðið uppskot til broytingar í forsorgarlógini, og vóru tær mestsum í lógarsniði.

Á nevndarfundi 30. september og 1. oktober 1980 vóru uppskotini umrødd og gingin igjøgnum út í ætir. Úrslitið varð, at almannamálaráðið skuldi seta saman uppskot eftir teimum broytingum, sum umrøddar vóru og harumframt seta upp viðmerkingar, sum í hesum føri verða av serligum týdningi. Avrátt varð eisini viðvikjandi nøkrum smærri punktum, at almannastjórin skuldi seta fram uppskot til orðaljóð.

3.2. Støðan nú er tann, at tey uppskot v.m., sum almannamálaráðið (og almannastjórin) skuldi gera, eru ikki gjørd.

3.3. Serliga um barnaforsorgarlógina:

Av tí at »bistandsloven« í Danmark eisini fevnir um tað øki, sum barnaforsorgarlógin hjá okkum fevnir um, er eisini gjørt uppskot til broytingar í barnaforsorgarlógini. Tað, sum sagt er um forsorgarlógina, er tí eisini galdandi fyri barnaforsorgarlógina.

20. februar 1981

Notat 27.7.1981 01

Sethúsabygging:

Í roknskaparárinum 1980/81 hevur Húsalánsgrunnurin veitt 487 nýggj lán móti 440 í árinum fyri.

Av hesum eru 217 lán til hús upp til 120 m². Av umbyggingarlánum eru alt veitt 110 lán.

Húsalánsgrunninum eru veittar 10 mió. kr. yvir figgjarlógina, og hevur grunnurin fingið eitt uttanlandslán til 25 mió. kr. til tess at nøkta tørvin.

Ætlanin er at broyta reglurnar fyri útlán grunsins í hesi tingsetuni.

Húsalánsgrunnurin

Ársfrágreiðing og roknskapur 1980/81

Ársfrágreiðingin

Í rakstrarárinum 1980/81 eru veitt 487 nýggj lán (1979/80: 440), og skifta tey seg soleiðis eftir kommunumum:

Lán til nýggj sethús:

Viðareiðis komm.	2	Fiðis komm.	5	Miðvágs komm.	11
Hvannasunds komm.	8	Sunds komm.	5	Sørvágs/Bíggjar komm.	13
Klaksvíkar komm.	33	Funnings komm.	1	Sands komm.	6
Mikladals komm.	1	Hvalvíkar komm.	1	Skopunar komm.	3
Oyndarfj. komm.	4	Hósvíkar komm.	5	Skálavíkar komm.	1
Fuglafj. komm.	14	Kollafj. komm.	11	Húsavíka komm.	1
Lorvíkar komm.	10	Kvívíkar komm.	7	Hvalbiar komm.	8
Gøtu komm.	7	Vestmanna komm.	19	Tvøroyrar komm.	9
Nes komm.	14	Tórsh. uttanb. komm.	17	Hovs komm.	3
Sjóvar komm.	10	Kirkjubøar komm.	3	Porkeris komm.	5
Skála komm.	9	Nólsoyar komm.	1	Vágs komm.	12
Runavíkar komm.	24	Sandavágs komm.	2	Sumbiar komm.	4
Tórshavnar komm.	88				

Av hesum eru 217 lán til hús upp til 120 m² og 160 lán til hús størri enn 120 m².

Umbyggingarlán:

Svínoyar komm.	2	Runavíkar komm.	21	Skopunar komm.	1
Hvannasunds komm.	3	Sunda komm.	1	Skálavíkar komm.	1
Klaksvíkar komm.	24	Hvalvíkar komm.	1	Hvalbiar komm.	2
Oyndarfj. komm.	1	Vestmanna komm.	1	Tvøroyrar komm.	7
Fuglafj. komm.	4	Tórsh. uttanb. komm.	4	Fámjins komm.	1
Lorvíkar komm.	4	Nólsoyar komm.	1	Porkeris komm.	2
Gøtu komm.	2	Sandavágs komm.	1	Vágs komm.	3
Nes komm.	1	Miðvágs komm.	3	Sumbiar komm.	3
Sjóvar komm.	2	Sørvágs/Bíggjar komm.	5	Tórshavnar komm.	24
Skála komm.	4	Sands komm.	1		

Tilsamans 110 lán.
13 lán eru fult afturgoldin.
Lánini eru nú 3.776 í tali og skifta seg soleiðis eftir kommunum:

Svínoyar komm.	4	Runavíkar komm.	244	Miðvágs komm.	70
Viðareiðis komm.	18	Eiðis komm.	36	Sørvágs/Biggjar k.	64
Hvannasunds k.	41	Sunda komm.	45	Sands komm.	37
Klaksvíkar komm.	402	Funnings komm.	5	Skopunar komm.	37
Kunoyar komm.	1	Gjáar komm.	3	Skálavíkar komm.	20
Mikladals komm.	1	Hvalvíkar komm.	19	Húsavíkar komm.	11
Húsa komm.	1	Haldórsvíkar komm.	16	Skúvoyar komm.	2
Oyndarfj. komm.	12	Hósvíkar komm.	14	Hvalbiar komm.	45
Elduvíkar komm.	6	Kollafj. komm.	73	Tvøroyrar komm.	201
Fuglafj. komm.	142	Kvívíkar komm.	34	Fámjins komm.	6
Lorvíkar komm.	78	Vestmanna komm.	99	Hovs komm.	5
Gøtu komm.	74	Tórs. uttanb. komm.	152	Porkeris komm.	17
Nes komm.	79	Kirkjubøar komm.	12	Vágs komm.	110
Sjóvar komm.	58	Nólsoyar komm.	26	Sumbiar komm.	33
Skála komm.	61	Sandavágs komm.	46	Tórshavnar komm.	1316

Stýrið viðgjørdi 475 nýggjar umsóknir 1979/80: 450). Tølini vísa eina hækking í lánumsóknum og veittum lánum.

Av teimum 487 veittu lánunum, eru 77,4% til nýggj hús, meðan 22,6% eru umbyggingarlán.

Áhugin at byggja hús undir 120 m² er stórur. Av teim 377 lánunum, veitt til nýggj hús í fíggjarárinum eru 57,5% til hús undir 120 m².

Av nýggjum húsum, prioriterað í Húsalánsgrunninum eftir 1. juli 1978 og sum grunnsins metingarmenn hava uppmált, vóru 194 undir 120 m².

Grunnurin virkar nú eftir ti nýggju løgtingslógini nr. 97 um Húsalánsgrunn frá 1. nov. 1978 og kunngerð nr. 1 frá 2. januar 1979, við gildi frá 1. juli 1978; men av tekniskari umlegging av bókhaldinum til E.D.V., hevur tað tó ikki verið gjørligt at sett afturgjaldingarskipanina í verk. Tað hevur tí, fram til mars terminina í ár, verið neyðugt at gingið eftir tí gomlu afturgjaldsskipanini.

Lánini, útgoldin áðrenn 1. juli 1978, ið hava fallið til gjaldingar í mars og september terminum, verða nú umløgd, soleiðis at terminirnar nú falla í mars og november mánað.

Umleggingin av lánum, útgoldin aftaná 1. juli 1978, er nú framd, fyrstu ferð mai termin 1981.

Afturgjaldingartíðin fyri nýggj hús kann ikki vera longri enn 40 ár og ikki styttri enn 20 ár, uttan so at lántakari sjálvur ynskir at stytta um hana.

Lánið verður afturgoldið við fýra eins stórum gjøldum árliga. Gjøldini, tað er renta og avdráttur, verða kravd í februar, mai, august og november mánað.

Meðalafturgjaldingartíðin verður at liggja um 28 ár. Sum dømi kann gevast, at um lántakari hevur kr. 100.000,00 í láni, og skattskylduga inntøkan -- uttan

frádrátt av rentu — er kr. 110.000,00, so verður ársgjaldið kr. 8.936,00 yvir 28 ár. Hetta broytist so í mun til skattskyldugu inntøkuna hvørt árið sær.

Endurnýggingar- og umbyggingarlánini verða aftur goldin yvir í mesta lagi 15 ár við eins stórum gjøldum, ið er renta og avdráttur, sum verða kravd í februar, mai, august og november mánað.

Grunnurin hevur í rakstrarárinum fingið kr. 10 mió. úr landskassanum, veittar á fíggjarlógini. Hesin peningur er lagdur aftur at stovnsfæmum, sum nú er komið uppi kr. 65.379.625,72. Við tiltaksgrunnum, tilsamans kr. 23.328.303,41, er eginpeningur grunnsins kr. 88.707.929,13. Í árinum fekk grunnurin 4 innanlendis lán við tilsamans kr. 4 mió. og eitt uttanlandslán til Hfl. 10 mió. svarandi til kr. 27.892.698,67, herav varð heimilað at nýta kr. 22 mió. í hesum fíggjarári.

Rentan er í ár hækkað til 8% p.a., eftir at hava verið óbroytt 7 1/2% p.a., síðan grunnurin varð stovnsettur.

Av uttanlandslánum er kursmunurin uppgjørdur við kurs pr. 31/3-1981 og er bókaður við kr. 8.735.445,48.

Samlaða útlánsupphæddin vaks úr kr. 104.312.423,18 uppí kr. 142.761.006,09. Tað er ein hækking upp á 38,02%.

Fíggjarliga orka grunnsins ger, at hámarkini, sum sett vórðu á lánsupphæddina, at hús og íbúðir upp til 120 m² fáa kr. 100.000,00 og hús ella íbúðir størri enn 120 m² fáa kr. 60.000,00, og umbyggingarlánini, ið hava ligið frá kr. 10.000,00 upp í kr. 45.000,00 ikki higartil hava verið broytt.

Stýrið hevur yvirfyri Føroya landsstýri, víst á fíggjarliga tørv grunnsins, og hevur landsstýrið lagt lógaruppskot fram á ting um lántøku.

Grunninum stendur í boði eitt uttanlandslán upp á Hfl. 10 mió. við 15 ára afturgjaldingartíð.

Rakstraravlopið er kr. 5.944.979,81. Stýrið skjýtur upp at leggja í tiltaksgrunn (sb. 6. grein í lógini) kr. 855.350,00 og í tiltaksgrunn II kr. 5.089.629,81.

Terminsleftirstøðan pr. 31/3-1981 er kr. 1.231.433,16, herav kr. 568.290,66 er avdráttur og kr. 663.142,49 er renta.

RAKSTRARROKNSKAPUR 1980/1981

1979/80 tús. kr.		Útreiðslur kr.	Inntøkur kr.
6.865	Rentur av útlánum		9.835.324,93
375	Aðrar rentuinntøkur		1.417.521,55
44	Kursvinningur av virðisbrøvum		36.630,00
471	Stovningarprovisión		855.350,00
3	Avskriving av innbúgvi	6.461,63	
811	Rakstrarútreiðslur	1.032.306,33	
2.778	Rentur av lánum	4.736.316,78	
228	Kurstap av uttanlandsláni	424.761,93	
	Til taks 5.944.979,81		
471	Í tiltaksgr.		
	sb. 6. gr. 855.350,00		
3.464	Í tiltaksgr.		
	gr. II 5.089.629,81	5.944.979,81	
7.755		12.144.826,48	12.144.826,48

FÍGGJARSTANDUR PR. 31/3-1981

1979/80 tús. kr.		Ogn kr.	Skuld kr.
104.313	Veðskuldabrøv	142.761.006,09	
120	Lán til S.E.V.	112.330,90	
899	Terminseftirstøður	1.231.433,15	
10.701	Kassi, bankar og sparikassar	17.384.237,98	
14	Útreiðslur goldnar frammanundan	0	
1.475	Virðisbrøv (Nom. kr. 4,349 mió.)	3.130.474,11	
25	Innbúgv	58.154,71	
2.924	Kursmunur	8.735.445,48	
30	Ognarar		129.324,10
55.380	Stovnspeningur		65.379.625,72
2.451	Tiltaksgr. sb. 6. gr.		3.306.200,25
14.932	Tiltaksgr. II		20.022.103,16
47.678	Lán (herav uttanlands-lán kr. 72.052.906,08)		84.575.829,19
120.471		173.413.082,42	173.413.082,42

Tórshavn, hin 2. juni 1981

Stýri:

Hans Jacob Debes — Hilmar Bech — Benny Samuelsen

Stjórn:

Jóannes Dalsgarð

Tórshavn, hin 9. juni 1981

Frammanfyri roknskapur, ið er samsvarandi við bøkur Húsalánsgrunnsins, hava vit grannskoðað.

At tær upplørdu ognirnar vóru til staðar, hava vit fingið prógv fyri.

Jógvan Sundstein
statsaut. revisor.

Jógvan Joensen

27/7-1981 — Notat. P 1

Mentamál.

Tað er í fíggjarligum trongtíðum at ein mentað tjóð skal vísa sítt sjálvstøði. Tí eiga veitingar til mentamál ikki at vera fyri av stórum niðurskurði, tá spartiltøk skulu fremjast.

Bæði landsskjalasavnið og fornminnissavnið arbeiða undir sera trongum umstøðum. Ynskiligt er at útvega hesum stovnum stærri høli.

Útvarp Føroya er flutt í nýggj hús í Gundadali. Byggikostnaðurin gjørdist høgur, einar 35 mill. kr. Hinvegin hevur útvarpið loksins fingið til húsa í einum tíðarhóskandi umhvørvi.

Landsstýrið hevur fingið tilboð frá felagnum Trans World Radio um at yvirtaka sendiloyvi útvarpsins á millumbylgjubandinum afturfyri at Útvarp Føroya fær ókeypis senditímar. Støða er ikki tikin til málið enn. Loyvi verður ikki givið, uttan at málið er lagt fyri tingið.

Í samsvar við løgtingslóg um stovnan av sjónvarpi, frá 1. nov. 1978, eru bygdar tvær sendistøðir, ein høvuðsstøð á Húsareyni, 10 KW stór, og ein endursendistøð á Hestinum, 200 W stór. Hesar støðir verða lidnar at taka í nýtslu til heystar. Tá verður møguligt at fara undir alment sjónvarp, og landsstýrið arbeiðir við uppskoti til føroyska sjónvarpslóggávu at leggja fyri tingið í hesi tingsetu.

Rammusáttmáli millum Danmark og Canada um føroysk fiskirættindi í kanadiskum sjógvi

SKJAL TIL LØGTINGSMÁL NR. 11:
RAMMUSÁTTMÁLI MILLUM DANMARK OG KANADA
UM FØROYSK FISKIRÆTTINDI Í KANADISKUM SJÓGVI.

Sáttmáli millum kongaríkið Danmark og Kanada viðvíkjandi føroyskum fiskiskapi við kanadisku strondina

KONGARÍKID DANMARK og KANADA,

SUM HUGSA UM ynski hjá báðum pørtum um at tryggja umsiting, stýring, varðveiting og rætta nýtslu av tí livandi ríkidøminum í havinum,

SUM AV NÝGGJUM ÁSANNA teirra ynski um at halda fram við samvinnu til felags gagn innan fyri fiskiskap og um at økja teirra samvinnu á hesum økinum,

SUM HAVA Í HUGA Føroya støðu sum ein sjálvstýrandi part av danska ríkinum, sum ber í sær, at heimastýri Føroya hevur lóggávuvald og umsitingarvald í málum viðvíkjandi fiskiskapi,

SUM VIÐURKENNA, at stjórn Kanada hevur viðkað sín yvirvaldsrætt yvir tí livandi ríkidøminum í farvøtnunum nærhendis Kanada sambært og samsvarandi grundreglunum í altjóða rætti tí viðvíkjandi, og hevur innan fyri eitt øki uppá 200 fjórðingar yvirvaldsrætt til at kanna, nýta, varðveita og umsita hetta ríkidømi,

SUM VIÐURKENNA, at yvirvaldsrætturin yvir tí livandi ríkidøminum í farvøtnunum nærhendis Føroyum er vorðin viðkaður út á 200 fjórðingar við tí í byggju at kanna, nýta, varðveita og umsita hetta ríkidømi,

SUM VIÐURKENNA, við hugsan um teir sermerktu geografisku eginleikarnar hjá Grand Banks — Flemish Cap-økinum uttan fyri kanadisku strondina, at fiskiskapur á hesum økinum uttan fyri og beint nærhendis tí øki, har Kanada hevur yvirvaldsrætt, eigur at fara fram á vísindarligum grundarlagi, við umhugsni um varðveiting av fiskastovnum og um tørvin hjá kanadiskum strandasamfeløgum,

SUM HUGSA UM áhugan hjá kanadisku sjórnini fyri vælferðini hjá kanadiskum strandasamfeløgum og fyri tí livandi ríkidøminum í havinum har nærhendis, sum hesi samfeløg byggja á,

SUM HAVA Í HUGA tann avgerandi týdning, fiskivinnan hevur fyri Føroyar, og hugsa um søguliga fiskiskapin hjá føroyskum skipum í farvøtnum, har Kanada nú hevur yvirvaldsrætt út fyri Atlantshavs-strondini,

SUM HUGSA UM landasiðvenju og arbeiðið hjá Triðju Havrættarráðstevnuni hjá Sameindu Tjóðunum,

SUM YNSKJA at koma ásamt um tær treytir og reglur, ið galda skulu fyri sínámillum fiskiviðurskifti teirra og at fremja eina siðiliga gongd í havrættinum,

ERU KOMIN ásamt um hetta:

GREIN I

Báðir partar átaka sær at tryggja neyva samvinnu í málum viðvikjandi varðveiting og nýtslu av ti livandi ríkidøminum í havinum. Teir skulu taka hóskandi stig til tess at lætta um slíka samvinnu og skulu halda áfram við at ráðføra seg hvør við annan í altjóða samráðingum og felagsskapum við ti í huga at náa felags endamálum innan fiskiskap.

GREIN II

1. Stjórn Kanada átekur sær at loyva føroyskum skipum at fiska innan fyri tað økið, har Kanada hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvikjandi, uttan fyri tað markið fyri kanadisku landleiðini og fiskiøkinum við atlantisku strondina, ið galt áðrenn 1. januar 1977, eftir hóskandi pørtum, ið tillutaðir verða av ti avlopi av mest loyvdu veiðinøgdini, sum fer upp um tað, ið Kanada sjálvt er ført fyri at fiska, í samsvari við forskriftirnar í petti 2 og 3 í hesi grein.

2. a) Kanadiska stjórnin skal, tá ið hon útinnir sin yvirvaldsrætt yvir ti livandi tiki-døminum í teimum havøkjum, ið nevnd eru í petti 1, fyri eitt ár isenn, við fyrivarni um broytingar vegna væntaðar umstøður, áseta:

(i) Mest loyvdu veiðinøgdina av einstøkum ella samtengdum stovnum við hugsan um sambandið stovnanna millum, altjóða viðurkendar metingarhættir og alt annað av týdningi,
(ii) hvat Kanada er ført fyri at veiða av slíkum stovnum, og,
(iii) aftaná hóskandi samráðingar áseta hóskandi tillutingar til føroysk skip av pørtum av avlopinum av stovnum ella samtengdum stovnum.

b) Stjórn Kanada átekur sær at geva viðkomandi myndugleikum í Danska Kongaríkinum fráboðan um tær tillutingar, sum eru nevndar omanfyri undir a) (iii), og tær undir a) (i) og (ii) umrøddu ásetingarnar teimum viðvíkjandi, í so góðari tíð sum gjørligt áðrenn tær veiðitíðir, tær viðvíkja.

3. Fyri at kunna fiska eftir kvotum sambært forskriftunum í petti 1 og 2, skulu føroysk skip hava loyvi frá viðkomandi kanadisku stjórnarmyndugleikum. Tey skulu rætta seg eftir varðveitingartiltøkum og øðrum treytum og reglum, sum stjórn Kanada ásetur, og skulu vera undirløgd kanadiskum lógum og fyriskipanum fiskiskapi viðvíkjandi.

4. Harumframt kunnu føroysk fiskiskip halda áfram við at royna eftir hemara við linu í tí partinum av øki 1 (St. Lawrence-flógvin) av tí kanadiska fiskiøkinum, sum er lýst í hjálagda korti, eftir somu treytum sum áðrenn 1. januar 1975, bert við tí undantaki, at slíkur framhaldandi fiskiskapur skal vera treytaður av loyvi ella loyvum frá kanadisku myndugleikunum, og kann verða steðgaður av kanadisku myndugleikunum við skrivligari uppsøgn í minsta lagi eitt ár, áðrenn eitthvørt 2-áratiðarskeið aftaná 1. januar 1979 er runnið.

3. Viðkomandi myndugleikar í Danska Kongarikinum skulu samarbeiða við kanadisku stjórnina á hóskandi hátt við hugsan um gongdina í fiskiviðurskiftunum partanna millum samsvarar forskriftirnar í hesi grein, innan fyri vísindaligar rannróknir, ið neyðugar eru fyri umsiting, varðveiting og nýtslu av tí livandi ríkidømunum á havøkjunum nevnd í hesi grein. Við hesum í huga skulu vísindamenn frá báðum pørtum ráðføra seg hvør við annan um, hvussu slíkar rannsóknir skulu fara fram, og um, hvussu úrslitini, ið nádd verða, skulu kannast og týðast.

GREIN III

1. Báðir partar ásanna tørvin á at tryggja varðveiting av tí livandi ríkidømunum uttan fyri tað økið, har londini hava yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi, og átaka sær tískil samvinnu sambært hesa grundreglu, bæði beinleiðis og gjøgnum hóskandi altjóða felagsskapir, til tess at tryggja rætta umsiting og varðveiting av hesum ríkidømi.

2. Har somu stovnar ella stovnar av samtengdum fiskasløgum finnast bæði innan fyri og uttan fyri kanadiskt fiskiøki á Grand Banks og Flemish Cap, og føroysk skip luttaka í ella ynskja at luttaka í veiðu eftir slíkum stovnum á økinum uttan fyri kanadiskt fiskiøki, skulu báðir partar antin beinleiðis ella gjøgnum hóskandi altjóða felagsskapir royna at koma ásamt um tiltøk til varðveiting og umsiting av hesum stovnum á økinum uttan fyri kanadiskt fiskiøki, við hugsan um tørvin á, at tiltøk, sum galda innan fyri kanadiskt fiskiøki, og tey, sum galda uttan fyri slíkt øki, samsvara hvørt við annað.

3. Har serstakir stovnar finnast á Grand Banks og Flemish Cap uttan fyri kanadiskt fiskiøki, og føroysk og kanadisk skip luttaka ella ynskja at luttaka í veiðu eftir slíkum stovnum, skulu báðir partar antin beinleiðis ella gjøgnum hóskandi altjóða felagsskapir royna at koma ásamt um tiltøk til varðveiting og umsiting av hesum stovnum.

4. Við hugsan um, at Grand Banks og Flemish Cap liggja nær kanadisku strondini, um siðvenjuna hjá ICNAF at veita Kanada serviðgerð sum strandalandið, tá talan er um stovnarnar á hesum økjunum, og um ta stóru ábyrgd og uppgávu Kanada átekur

sær við at vakja yvir og ansa eftir altjóða fiskiskapi eftir hesum stovnum, og við at tryggja teirra verju gjøgnum altjóða atgerðir, skulu báðir partar í teirra samvinnu sambært treytirnar í hesi grein hava í huga tann serliga áhuga, grundaðan á omanfyri nevndu orsøkir, ið Kanada hevur fyri varðveiting av hesum stovnum uttan fyri kanadiskt fiskiøki, og fyri kvotum burturav teimum, eins væl og føroyskan áhuga fyri hesum stovnum.

GREIN IV

1. Treytað av, at møguleikar eru til staðar, og av tørvinum hjá kanadiskum skipum, átekur kanadiska stjórnin sær at loyva føroyskum skipum atgongd til kanadiskar havnir, sambært kanadiskar lógir, fyriskipanir og fyrisetingarlig krøv, fyri at keypa agn, útbúning, ella útgerð ella vegna umvælingar, ella við øðrum endamálum, sum kanadiska stjórnin ger av, tá ið slík skip hava loyvi at fiska ella at hjálpa til við fiskiskapi sambært grein II.

2. Slíkt loyvi kann gerast ógildugt fyri eitthvørt skip, um tess fiskiloyvi ella loyvi til at hjálpa til við fiskiskapi verður tikið burtur, uttan tá ið skipið skal leggja at í havn fyri at keypa útgerð ella gera umvælingar, sum eru neyðugar fyri ferðina út.

3. Fyriskipanirnar í hesi grein skulu ikki ávirka rættin til atgongd til kanadiskar havnir, tá talan er um neyð, sjúku ella force majeure.

GREIN V

1. Báðir partar viðurkenna, at lond, í hvørs ám anadromir stovnar hava sín uppruna, hava høvuðsáhugan fyri og høvuðsábyrgdina av slíkum stovnum, og eru samdir um, at veiða eftir anadromum fiskasløgum ikki eigur at fara fram uttan fyri tað økið, har londini hava yvirvaldsrætt í fiskiskapi viðvíkjandi. Teir vilja halda áfram við at arbeiða saman fyri at fáa í lag varandi margpartaskipanir, sum visa hesa støðu.

2. Sambært petti 1 skulu viðkomandi myndugleikar í Danska Kongaríkinum taka stig til at tryggja, at føroysk skip, sum fiska uttan fyri føroyska fiskimarkið, lata vera við at taka anadrom fiskasløg, sum eru gýtt í kanadiskum farvøtnum.

GREIN VI

1. Viðkomandi myndugleikar í Danska Kongaríkinum skulu taka stig til at tryggja, at føroysk skip rætta seg eftir fyriskipanunum í hesum sáttmála og eftir tiltøkum, sum partarnir av og á koma ásamt um sambært fyriskipanunum í hesum sáttmála.

2. Kanadiska stjórnin skal taka neyðug stig til at seta fyriskipanirnar í hesum sáttmála í verk, íroknað veiting av loyvum.

GREIN VII

1. Partarnir báðir skulu hava tíðarvísar samráðingar sínámillum um, hvussu hesin sáttmáli skal setast í verk, og um, hvussu víðari samvinna skal fara fram.

2. Partarnir báðir skulu saman kanna møguleikarnar fyri størri sínámillum samvinnu, íroknað samvinnu um slík mál sum býti av tekniskum upplýsingum, og fólki, betri nýtslu og tilvirking av fongi, lættari atgongd til at fáa í lag samvinnutiltøk millum kanadiskar og føroyskar fyritøkur viðvíkjandi nýtslu av ti livandi ríkidømunum í havinum kring kanadisku strondina, skipanir, ið loyva føroyskum fiskiførum at nýta kanadiskar havnir fyri at taka umborð ella seta av manning ella aðrar persónar ella við øðrum endamálum, sum partarnir koma ásamt um. Teir skulu harumframt býta marknaðarupplýsingar viðvíkjandi fiski og skulu arbeiða saman um víðkan og menning av marknaðunum fyri fiski og fiskavørum.

3. Í samráðingunum, sum eru nevndar í petti 2 a) (iii) í grein II viðvíkjandi tillutingum til føroysk fiskiskip burturav avlopi av stovnum ella samtengdum stovnum, skal kanadiska stjórnin hava í huga alt av týdningi, íroknað millum annað kanadisk áhugamál, fong áður hjá føroyskum skipum av slíkum stovnum ella samtengdum stovnum og menning av samvinnu millum partarnar sambært fyriskipanirnar í hesum sáttmála.

GREIN VIII

1. Treytað av petti 2 skal einki í hesum sáttmála metast at ávirka aðrar altjóða sáttmálar, sum partarnir longu eru bundnir av, ella at nerva støðuna hjá pørtunum til nakað mál, sum verður viðgjørt av triðju havrættarráðstevnuni hjá Sameindu Tjóðunum.

2. Tá ið hesin sáttmáli kemur í gildi, skal sáttmálin frá 27. mars 1972 millum Danmark og Kanada um danskan fiskiskap uttan fyri kanadisku strondina fara úr gildi.

GREIN IX

1. Hesin sáttmáli skal takast upp til kanningar av báðum pørtum, tá ið samráðingarnar um ein margpartasáttmála, sum úrslit av triðju havrættarráðstevnuni hjá Sameindu Tjóðunum, eru lidnar.

2. Hesin sáttmáli kann uppsigast av báðum pørtum tann 1. januar 1983 ella aftaná citthvørt 2-ára-tíðarskeið aftaná tað, treytað av, at fráboðan um uppsøgn er givin í minsta lagi 12 mánaðar áðrenn slíka uppsøgn.

GREIN X

Hesin sáttmáli fær gildi tann dag, tá ið partarnir við boðskrivaskifti boða hvørjum øðrum frá, at tann málsviðgerð, ið neyðug er í hesum føri, er fullførd.

SKJAL TIL LØGTINGSMÁL NR. 12:
GÓÐKENNING AV SÁTTMÁLANUM UM FRAMTÍÐAR MARGPARTA SAMVINNA UM FISKISKAP Í LANDNYRÐINGSATLANTSHAVI.

Sáttmáli um framtíðar margparta samvinnu um fiskiskap í landnyrðingsatlantshavi

Sáttmálapartarnir,

SUM taka til eftirtektar, at strandalondini í Landnyrðingsatlantshavinum, samsvarandi viðkomandi grundreglum í fólkarættinum, hava viðkað yvirvaldsrætt teirra yvir ti livandi ríkidøminum í farvøtnunum nærhendis teimum út á mark upp til 200 fjórðingar frá grundlinjunum, haðani breiddin á landleiðini verður málð, og at tey innan fyri hesi øki hava einayvirvaldsrætt til at kanna og nýta, varðveita og umsita hetta ríkidømi,

SUM umhugsa arbeiðið hjá Triðju Havrættarráðstevnuni hjá Sameindu Tjóðunum fiskiskapi viðvikjandi,

SUM ynskja at fremja varðveiting og bestu nýtslu av fiskiríkidøminum í Landnyrðingsatlantshavi innan fyri ein karm, ið hóskar til skipanina við viðkaðum yvirvaldsrætti hjá strandalondunum og harvið eggja til altjóða samvinnu og samráðingar viðvikjandi hesum ríkidømi,

SUM hava í huga, at sáttmálin frá 24. januar 1959 um fiskiskap í Landnyrðingsatlantshavi samsvarandi hesum eigur at verða útskiftur,

ERU komnir ásamt um hetta:

GREIN I

1. Tað økið, sum hesin sáttmáli umfatar, eftir hetta kallað »sáttmálaøkið«, skulu vera farvøtnini:

(a) Innan fyri teir partar av Atlantshavinum og Ishavinum og grannahøvum teirra, sum liggja norðan fyri 36° norðurbreidd og imillum 42° vesturlongd og 51° eysturlongd, við undantaki av:

(i) Eystrasalti og Beltunum, ið liggja sunnan og eystan fyri linjur, ið ganga frá Hasenøre Hoved til Gnibens Spids, frá Korshage til Spodsbjerg og frá Gilbjerg Hoved til Kullen og

(ii) í Miðalhavinum og grannahøvum tess til skeringspunktið millum 36. breiddarstig og longdarstigið 5° 36' vestur.

(b) innan fyri tann partin av Atlantshavinum, ið liggur norðan fyri 59° norðurbreidd og imillum 44° vesturlongd og 42° eysturlongd.

2. Hesin sáttmáli viðvikur øllum fiskiríkidømi í sáttmálaøkinum við undantaki av havsúgdjórum, sedentærum fiskasløgum, t.e. verur, sum á tí stiginum, tá tær kunnu veiðast, antin sita stillar á ella undir havbotninum ella ikki eru førar fyri at røra seg uttan í støðugum kroppsligum sambandi við havbotnin ella grundina undir honum, stovnum, ið ferðast viða, og anadromum stovnum, t.e. stovnar, ið fara niðan í áirnar at gýta, um hesir stovnar eru umfataðir av øðrum altjóða sáttmálum.

GREIN II

Einki í hesum sáttmála skal metast at ávirka tey rættindi, krøv ella sjónarmið, sum nakar av pørtunum hevur viðvikjandi markinum fyri og viddini av yvirvaldsrætti yvir fiskiskapi.

GREIN III

1. Til tess at uppfylla endamálini við hesum sáttmála eru partarnir samdir um at stovnseta og uppihalda nevnd, ið skal kallast Nevndin fyri Fiskivinnu í Landnyrðingsatlantshavi, eftir hetta kallað nevndin.

2. Nevndin skal vera ein løgfrøðisligur persónur og skal mótvegis øðrum altjóða felagsskapum og á økjunum hjá sáttmálapørtunum hava eina slíka rættarstøðu, sum kann vera neyðug, fyri at hon skal kunna útinna virksemi sítt og náa endamál síni.

3. Hvør av sáttmálapørtunum skal útnevna í mesta lagi tveir umboðsmenn í nevndina, og hesir kunnu til allar fundir hava við sær serfrøðingar og ráðgevarar.

4. Nevndin skal velja ein formann og í mesta lagi 2 varaformenn.

5. Skrivstovan hjá nevndini skal vera í London.

6. Um nevndin ikki tekur aðra avgerð, skal hon koma saman eina ferð um árið í London til ta tíð, ið hon sjálv ásetur; tó kann formaðurin eftir áheitan frá einum av sáttmálapørtunum og við samtykki frá trimum øðrum sáttmálapørtum so skjótt sum gjørligt kalla saman til fundar til ta tíð og á tí stað, ið hann ásetir.

7. Nevndin velur ein skrivara og onnur starvsfólk, ið eru neyðug.

8. Nevndin kann seta á stovn slíkar nevndir og undirnevndir, sum hon heldur vera neyðugar fyri at kunna greiða sínar skyldur og virki annars.

9. Hvør av sáttmálapørtunum skal hava eina atkvøðu í nevndini. Avgerðir í nevndini skulu takast við vanligum meiriluta, ella, um sáttmálin krevur kvalifiseraðan meiriluta, við 2/3 meiriluta av atkvøðunum hjá øllum sáttmálapørtunum, ið eru til staðar, og sum greiða atkvøðu fyri ella ímóti; atkvøðast kann bert, um í minsta lagi tveir triðingar av sáttmálapørtunum eru til staðar. Standa atkvøðurnar á jøvnum í einum máli, ið skal avgerast við vanligum meiriluta, er málið fallið.

10. Sambært reglunum í hesi grein skal nevndin sjálv seta í verk reglur og mannagongd fyri virki sítt, harímillum reglur fyri vali av formanni og næstformanni og starvstíð teirra.

11. Frásagnir frá fundum í nevndini skulu skjótast gjørligt sendast sáttmálapørtunum á enskum og fronskum.

GREIN IV

1. Nevndin skal útinna virki sítt við varðveiting og bestu nýtslu av fiskiríkidømunum í sáttmálaøkinum fyri eyga, og skal hetta byggja á tað besta vísindaliga grundarlag, ið er til taks hjá henni.

2. Nevndin skal vera eitt forum fyri ráðleggingum og býti av upplýsingum um støðuna hjá fiskastovnunum í sáttmálaøkinum, og um varðveitingarpolitikk, íroknað hvørja ávirkan hesin politikkur yvirhøvur hevur á fiskastovnarnar.

GREIN V

1. Nevndin skal um neyðugt gera tilmæli viðvíkjandi fiskiskapi uttan fyri tey økir, sum eru undir yvirvaldsrætti sáttmálapartanna. Slík tilmæli skulu samtykkjast við kvalifiseraðum meiriluta.

2. Nevndin skal í virki sínum eftir petti 1, stremba ímóti samsvari ímillum:

(a) eitt og hvørt tilmæli, ið viðvíkur einum stovni ella bólki av stovnum, ið finnast bæði innan fyri fiskimarkið hjá einum sáttmálaparti og uttanfyri, ella eitt og hvørt tilmæli, sum vegna samband millum fiskasløgini kann ávirka ein stovn ella bólk av stovnum, sum eru heilt ella partvis inni á sjóøkinum hjá einum sáttmálaparti og

(b) eitt og hvørt tiltak og avgerð hjá einum slíkum sáttmálaparti til umsiting ella varðveiting av viðkomandi stovni ella bólki av stovnum, viðvikjandi fiskiskapi á tí sjóøkinum, har viðkomandi sáttmálapartur hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi. Viðkomandi sáttmálapartur og nevndin skulu í samsvari við hetta fremja samskipan av slíkum tilmælum, tiltøkum og avgerðum.

3. Til tess at náa endamálinum við petti 2, skal ein og hvør sáttmálapartur geva nevndini allar upplýsingar um sini tiltøk og sínar avgerðir.

GREIN VI

1. Nevndin kann gera tilmæli viðvíkjandi fiskiskapi innanfyri eitt øki, sum er undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá einum av sáttmálaparti, um so er at viðkomandi sáttmálapartur biður um tað og atkvøður fyri tilmælinum.

2. Nevndin kann ráðgeva viðvíkjandi fiskiskapi nevndur í petti 1, um viðkomandi sáttmálapartur ynskir tað.

GREIN VII

Í virki sínum, sum nevnt í grein 5 og 6 kann nevndin umhugsa tiltøk m.a. viðvíkjandi:

(a) áseting av reglum um fiskireiðskap og tól, íroknað meskavíddir,

(b) áseting av minstu stødd á fiski, sum tað er loyvt at hava umborð á skipum, at landa, útstilla ella bjóða fram til sølu,

(c) áseting av stongdum økjum og tíðarbilum,

(d) tiltøkum at bøta um og økja fiskiríkidømið, ið kunnu umfata tiltøk viðvíkjandi nøring, flytan av verum og flytan av yngli,

(e) áseting av mest loyvdu veiðunøgd og býti av henni til sáttmálapartarnar,

(f) áseting av veiðuorkuni og býti av henni imillum sáttmálapartarnar.

GREIN VIII

1. Nevndin kann við kvalifiseraðum meiriluta gera tilmæli um tiltøk viðvíkjandi fiskiskapi uttan fyri øki, sum eru undir yvirvaldsrætti hjá einum av sáttmálapørtunum fiskiskapi viðvikjandi við tí endamáli, at tryggja, at hesin sátmáli og tey tilmæli, sum samtykt eru undir honum, verða framd.

2. Nevndin kann eisini gera tilmæli um eftirlitstiltøk fiskiskapi viðvíkjandi innanfyri eitt øki, sum er undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá einum sáttmálaparti, um so er, at viðkomandi sáttmálapartur biður um tað og atkvøður fyri tí.

3. Tilmæli, sum eru samtykt undir hesi grein, kunnu eisini umfata aðrar avtøkureglur enn tær, ið ásettar eru í grein 13.

GREIN IX

1. Nevndin kann við kvalifiseraðum meiriluta gera tilmæli um savning av hagtalsupplýsingum um fiskiskap uttan fyri øki, sum eru undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá sáttmálapørtunum.

2. Nevndin kann eisini gera tilmæli um innsavning av hagtalsupplýsingum um fiskiskap innan fyri eitt øki, sum er undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá einum sáttmálaparti, um so er, at hesin sáttmálapartur atkvøðir fyri ti.

GREIN X

Tá ið nevndin samtykkir tilmæli, skal hon avgera, hvussu og undir hvørjum umstøðum hesi tilmæli skulu galda fyri royndarfiskiskap, sum einans hevur vísindaligt endamál, og sum verður útinntur samsvarandi reglum og ásetingum í fólkarættinum.

GREIN XI

1. Nevndin skal uttan óneyðugt dráil geva sáttmálapørtunum boð um tey tilmæli, sum nevndin samtykkir undir hesum sáttmála.

2. Nevndin kann almannakunngera ella á annan hátt útsenda frágreiðingar um virki sítt og geva aðrar upplýsingar viðvikjandi fiskiskapi í sáttmálaøkinum.

GREIN XII

1. Eitt tilmæli skal vera bindandi fyri sáttmálapartarnar samsvarandi reglunum í hesi grein og skal koma í gildi tann dag, ið nevndin avger. Hesin dagur skal ikki vera innan 30 dagar aftaná, at freistin ella freistirnar at mótmæla samsvarandi hesi grein eru úti.

2. (a) Ein og hvør sáttmálapartur kann innan 50 dagar frá tí degi, tá ið eitt tilmæli er fráboðað, og sum er samtykt eftir grein 5, petti 1, grein 8, petti 1 ella grein 9, petti 1 í hesum sáttmála, mótmæla tí. Um mótmælt verður, kann ein og hvør annar sáttmálapartur líkaleiðis mótmæla innan 40 dagar eftir, at teir hava fingið boð um hetta mótmæli. Um nakað mótmæli kemur innan hetta seinna tíðarskeið uppá 40 dagar, kunnu aðrir sáttmálapartar fáa eina seinastu freist uppá 40 dagar aftaná, at teir hava fingið boð um mótmælið, at senda inn mótmæli.

(b) Eitt tilmæli verður ikki bindandi fyri ein sáttmálapart, sum hevur mótmælt tí.

(c) Um triggir ella fleiri sáttmálapartar hava mótmælt einum tilmæli, verður tað ikki bindandi fyri nakran sáttmálapart.

(d) Undantikið tá eitt tilmæli ikki er bindandi fyri nakran sáttmálapart samsvarandi áseturunum í undirpetti (c), kann ein sáttmálapartur, sum hevur mótmælt einum tilmæli, altíð taka hetta mótmælið aftur, og skal hann tí vera bundin av tilmælinum innan 70 dagar, ella frá tí degi, sum er samtyktur av nevndini sambært petti 1, alt eftir hvør dagur er seinri.

(e) Um eitt tilmæli ikki er bindandi fyri nakran sáttmálapart, kunnu tó tveir ella fleiri sáttmálapartar kortini til cina og hvørja tíð semjast um at gerast bundnir av tí, og skulu teir tá beinan vegin boða nevndini frá hesum.

3. Í tí føri, har eitt tilmæli er samtykt sambært grein 6, petti 1, grein 8, petti 2 ella grein 9, petti 2, kann bert tann sáttmálapartur, ið hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi á viðkomandi øki, mótmæla hesum innan 60 dagar frá tí degi tilmælið er fráboðað, og verður tá tilmælið ikki bindandi fyri nakran sáttmálapart.

4. Nevndin skal geva sáttmálapørtunum boð um eitt og hvørt mótmæli og afturtøku av mótmæli beinan vegin aftaná móttøkuna av hesum og um, nær eitt tilmæli kemur í gildi, og um nær ein og hvør semja, sum er gjørd samsvarandi petti 2, undirpetti c, verður sett í verk.

GREIN XIII

1. (a) Eitt ár aftaná, at eitt tilmæli, sum er samtykt sambært grein 5, petti 1, grein 8, petti 1 ella grein 9, petti 1, er komið í gildi, kann ein og hvør sáttmálapartur boða nevndini frá, at hann ikki longur vil vera bundin av viðtøkuni, og um henda fráboðan ikki verður tikin aftur, skal tilmælið ikki longur vera bindandi fyri viðkomandi sáttmálapart, aftaná eitt ár er umliðið frá tí degi, fráboðanin var dagfest.

(b) Eitt tilmæli, sum er hildið uppat at vera bindandi fyri ein sáttmálapart, skal halda uppat at vera bindandi fyri ein og hvønn annan sáttmálapart 30 dagar aftaná, at hesin hevur sagt nevndini frá, at hann ikki longur vil vera bundin av tilmælinum.

2. Í tí føri, har eitt tilmæli er samtykt sambært grein 6, petti 1, grein 8, petti 2 ella grein 9, petti 2, kann bert tann sáttmálapartur, ið hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi á viðkomandi øki, geva nevndini boð um, at hann ikki longur vil vera bundin av tilmælinum, og í hesum føri skal tað halda uppat at vera bindandi fyri allar sáttmálapartar 90 dagar frá tí degi, tá fráboðanin var dagfest.

3. Nevndin skal boða sáttmálapørtunum frá hvørjari fráboðan sambært hesi grein, so skjótt hon er henni í hendi.

GREIN XIV

1. Fyri at tryggja bestu útinningina av tí virki, sum er umrøtt í greinunum 4, 5 og 6 skal nevndin søkja sær upplýsingar og ráð hjá Millumlanda Ráðnum fyri Havrannsóknir. Slíkar upplýsingar og slik ráð, skulu søkjast viðvíkjandi málum, ið nevndin hevur við at gera, og sum fella undir starvsøkið hjá Ráðnum, íroknað upplýsingar og ráð um lívfrøði og populatiónsdynamikkin hjá viðkomandi fiskasløgum, støðuna í stovnunum, hvussu fiskiskapurin ávirkar stovnin og tiltøk viðvíkjandi varðveiting og stýring av teimum.

2. Fyri at lætta um arbeiðið hjá Millumtjóða Ráðnum fyri Havrannsóknir at geva nevndini upplýsingar og ráð, skal nevndin í samarbeiði við Ráðið seta í verk tiltøk, ið tryggja, at rannsóknir hesum viðvíkjandi, íroknað felags rannsóknir, verða stuðlaðar og munagott fyristílaðar uttan óneyðugt dráil.

3. Nevndin kann seta á stovn samarbeiðsskipanir við ein og hvønn alfjóða felagsskap, ið hevur líknandi endamál.

GREIN XV

1. Uttan at broyta rættarstøðu sáttmálapartanna viðvíkjandi rætti teirra til sjóøki innan teirra fiskimark, skulu teir taka slík stig, íroknað áseting av hóskandi revsing fyri brot, í tann mun hetta er neyðugt fyri at fremja ásetanirnar í hesum sáttmála og seta í gildi eitt og hvørt tilmæli, sum er bindandi sambært grein 12.

2. Hvør av sáttmálapørtunum skal hvørt ár geva nevndini eina frágreiðing um hvørji stig hann sambært petti 1 hevur tikið.

GREIN XVI

1. Hvør av sáttmálapørtunum skal geva nevndini boð um øll lógartiltøk og um allar avtalur, sum teir hava gjørt, um so er, at hesi lógartiltøk og hesar avtalur hava samband við varðveiting og nýtslu av fiskiríkidøminum í sáttmálaøkinum.

2. Hvør av sáttmálapørtunum skal, tá nevndin biður um tað, fáa til vega allar vísindaligar og hagtals upplýsingar, sum eru neyðugar til tess at uppfylla hendu sáttmála, og slíkar aðrar upplýsingar, sum kunnu gerast neyðugar sambært greint 9.

GREIN XVII

1. Hvør av sáttmálapørtunum skal rinda útreiðslurnar hjá sendinevnd sini til fundir, ið verða hildnir sambært hesum sáttmála.

2. Á fyrsta fundi sínum skal nevndin samtykkja eina fíggjarætlan fyri fyrsta fíggjarárið. Á hesum fundi kann nevndin eisini, um hon heldur tað vera rímuligt, samtykkja eina fíggjarætlan fyri tað næsta fíggjarárið.

3. Á hvørjum ársfundi skal nevndin samtykkja eina fíggjarætlan fyri tað fylgjandi fíggjarárið og uppskot til fyribils fíggjarætlan fyri árið eftir. Uppskot til fíggjarætlan og uppskot til fyribils fíggjarætlan skulu av formanninum fyri nevndina leggjast fyri sáttmálapartarnar í minsta lagi 40 dagar áðrenn fundin, har ætlanin er at viðgera tey.

4. Nevndin skal áseta gjøldini frá hvørjum sáttmálaparti sambært ársfíggjarætlanini á fylgjandi grundarlagi:

(a) ein triðingur av fíggjarætlanini skal býtast javnt ímillum sáttmálapartarnar.

(b) tveir triðingar av fíggjarætlanini skulu býtast ímillum partarnar í mun til teirra nominellu veiðu í sáttmálaøkinum, grundað á tey endaligu hagtølini, sum Altjóða Ráðið fyri Havrannsóknir hevur gjørt fyri almanakkaárið, ið endar í mesta lagi 24 og í minsta lagi 18 mánaðir áðrenn fíggjarárið byrjar.

(c) tó skal árliga gjaldið hjá einum sáttmálaparti, ið hevur minni enn 300.000 íbúgvar, avmarkast til í mesta lagi 5% av fíggjarætlanini. Tá ið henda avmarking av gjaldinum er gjørd, skal restin av fíggjarætlanini býtast ímillum hinar sáttmálapartarnar sambært undirpetti (a) og (b). Henda regla er galdandi fyri fimm tey fyrstu fíggjarárini hjá nevndini, og hareftir skal nevndin hvørt ár avgera, um reglan framvegis skal vera galdandi. Nevndin kann broyta hana við eini avgerð, ið er samtykt við 3/4 meiriluta av øllum sáttmálapørtunum.

5. Nevndin skal geva hvørjum sáttmálaparti boð um, hvussu stórt gjaldið frá hesum sáttmálaparti sambært petti 4 skal vera, og um dagin, ið nevndin hevur ásett, tá gjaldið skal vera goldið.

6. Limagjaldið hjá einum sáttmálaparti, sum er komin uppí felagsskapin í einum fíggjarári, verður fyri hetta árið ein partur av ti ársgjaldi, sum er roknað samsvarandi ásetaninum í petti 4, og sum svarar til talið av fullum mánaðum, sum eftir eru av árinum.

7. Gjøldini skulu gjaldast í gjaldoyranum hjá tí landi, har nevndin hevur skrivstovu sína.

8. Ein sáttmálapartur, sum í tvey ár ikki hevur rindað gjald sítt tann dag, sum nevndin hevur ásett, skal ikki hava rætt til at atkvøða og til at mótmæla samsvarandi hesum sáttmála, fyrr enn hann hevur greitt skyldur sínar, uttan so, at annað er avgjørt av nevndini eftir áheitan frá viðkomandi sáttmálaparti.

9. Nevndin skal gera reglur fyri leiðsluna av figgjarviðurskiftum sínum.

GREIN XVIII

Við kvalifiseraðum meiriluta kann nevndin býta sáttmálaøkið sundur í øki, broyta markini teirra millum og talið av økjum, um so er, at hendu avgerð fær ja-atkvøðu frá einum og hvørjum sáttmálaparti, ið hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi í onkrum parti av tí øki, broytingin kemur at ávirka.

GREIN XIX

1. Ein og hvør sáttmálapartur kann seta fram uppskot um broytingar tit hendu sáttmála. Eitt slíkt broytingaruppskot skal sendast skrivaranum í minsta lagi 90 dagar áðrenn tann fundin, har sáttmálaparturin ætlar broytingina at verða viðgjørda. Skrivarin skal beinan vegin senda uppskotið til sáttmálapartarnar.

2. Fyri at eitt broytingaruppskot skal verða samtykt krevst ein meiriluti uppá triggjar fjórðingar av øllum sáttmálapørtunum. Teksturin til eitthvørt samtykt broytingaruppskot skal handast depositarinum, sum beinan vegin skal senda sáttmálapørtunum tað.

3. Ein broyting kemur í gildi fyri sáttmálapartarnar 120 dagar eftir tann dag, ið depositarurin hevur boðað frá móttøku av skrivligari fráboðan um samtykt frá trimum fjórðingum av øllum sáttmálapørtunum, uttan so, at ein annar sáttmálapartur innan 90 dagar frá tí degi, ið depositarurin hevur boðað frá slíkari móttøku, boðar depositarinum frá, at hann mótmælir broytingini, og skal broytingin tá ikki koma í gildi fyri nakran av sáttmálapørtunum. Ein sáttmálapartur, sum hevur mótmælt broytingini, kann til cina og hvørja tíð taka mótmælið aftur. Um øll mótmæli móti broytingini eru tikin aftur, skal broytingin koma í gildi fyri sáttmálapartarnar 120 dagar eftir tann dag, ið depositarurin hevur boðað frá tí síðstu afturtøkuni.

4. Ein partur, sum staðfestur, góðtekur, góðkennir ella tekur undir við hesum sáttmála aftaná, at ein broyting er samtykt samsvarandi petti 2, skal haldast at hava góðtikið nevndu broyting.

5. Depositarurin skal beinan vegin boða øllum sáttmálapørtunum frá móttøku av frásøgnum um góðkenning av broytingum, móttøku av frásøgnum um mótmælir ella afturtøku av mótmælum og frá, at broytingar koma í gildi.

GREIN XX

1. Hesin sáttmáli skal vera opin fyri undirriting frá 18. november 1980 til 28. februar 1981 av fylgjandi pørtum: Bulgaria, Kuba, Danmark fyri Føroyar, EEC, Finlandi, Týska Demokratiska Lýðveldinum, Íslandi, Norcgi, Póllandi, Portugal, Spania, Svøriki og Sovjetsamveldinum. Hann skal verða staðfestur, góðtikin ella góðkendur so skjótt sum møguligt, og øll staðfestingar-, góðtøku- ella góðkenningarskjøl skulu handast stjórnini í Bretlandi og Norðurírlandi, í hesum sáttmála kallað »depositarurin«, til varðveitslu.

2. Hesin sáttmáli skal koma í gildi eftir at minst sjey undirritarar hava latið inn staðfestingar-, góðtøku- ella góðkenningarskjølini, um so er at í minsta lagi 3 av hesum undirritarunum hava yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi innan fyri sáttmálaøkið. Um hesin sáttmáli ikki er komin í gildi innan 1 ár frá tí degi, tá hesin sáttmáli varð opin fyri undirriting, men í minsta lagi fimm undirritarar hava latið inn staðfestingar-, góðtøku- ella góðkenningarskjøl, íroknað í minsta lagi tríggjar undirritarar, ið hava yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi í sáttmálaøkinum, kunnu hesir undirritarar sínámillum við serligari protokoll semjast um dagin, tá hesin sáttmáli skal koma í gildi; í hesum føri skal sáttmálin koma í gildi fyri ein og hvønn part, ið staðfestir, góðtekur ella góðkennir hateftir tann dag, hesin partur letur inn staðfestingar-, góðtøku- ella góðkenningarskjøl síni.

3. Ein og hvør partur, ið er umtalaður í petti I, ið ikki hevur undirritað sáttmálan, kann gerast partur av honum til eina og hvørja tíð aftaná, at hann er komin í gildi sambært petti 2.

4. Eitt og hvørt ríki, ið ikki er umtalað í petti 1, við undantaki av einum limalandi í EEC, kann gerast partur í sáttmálanum til eina og hvørja tíð aftaná, at hann er komin í gildi sambært grein 2, um so er at ein umsókn um upptøku frá hesum landi verður viðurkend av trimum fjórðingum av øllum sáttmálapørtunum.

Umsókn um upptøku skal vera skrivlig og sendast til depositarin, sum skal geva øllum sáttmálapørtum boð um hetta. Umsóknin er góðtikin, um tríggir fjórðingar av øllum sáttmálapørtunum, ið sáttmálin longu fevnir um, innan 90 dagar frá frá-boðanardegnum hava givið depositarinum boð um teirra góðkenning av umsóknini.

Depositarurin skal geva viðkomandi ríki, ið hevur søkt um upptøku, og øllum sáttmálapørtunum boð um úrslitið av umsóknini.

5. Upptøka verður framd við at lata depositarinum eitt upptøkuskjal í varðveitslu og kemur í gildi móttøkudagin. Frá hesum degi skal ein og hvør partur, ið tekur undir við hesum sáttmála, verða bundin av teimum tilmælum, ið eru bindandi fyri allar hinar sáttmálapartarnar, eins og hann verður bundin av øllum tilmælum, ið tá eru

bindandi fyri ein ella fleiri av sáttmálapørtunum, um hann ikki hevur tikið serligt fyrivarni hesum viðvíkjandi í upptøkuskjalinum.

6. Depositarurin skal geva øllum undirritarum og øllum upptiknum pørtum boð um øll staðfestingar-, góðtøku- ella góðkenningarskjøl, ið eru latin honum í varðveitslu, og skal geva undirritarunum boð um dagin, tá sáttmálin kemur í gildi, og hvørjar partar hann fevnir.

7. Depositarurin skal kalla saman fyrsta fundin hjá nevndini so skjótt møguligt, aftaná at sáttmálin er komin í gildi, og skal senda fyribils fundarskrá til hvønn av sáttmálapørtunum.

GREIN XXI

Ein og hvør sáttmálapartur kann til eina og hvørja tið tvey ár aftaná, at hesin sáttmali kom í gildi fyri hansara viðkomandi, taka seg burtur úr felagsskapinum við skrivligari fráboðan til depositarin. Slík fráboðan um burturúrtøku kemur í gildi 12 mánaðir aftaná, at hon er móttikin, og skal depositarurin geva sáttmálapørtunum boð um hetta.

GREIN XXII

Hesin sáttmáli, hvørs enskt og franskt tekstur hava sama gildi skal latast í varðveitslu hjá stjórnini í Sameinda Kongarikinum Stóra Bretlandi og Norður Írlandi. Depositarurin skal lata váttað avrit til undirritararnar og upptiknar partar og skal skráseta sáttmálan sambært grein 102 í Sáttmála Sameindu Tjóða.

SKJAL TIL LØGTINGSMÁL NR. 27:
BROYTING Í LÓGUNUM UM ALMENNA FORSORG, FÓLKA-, AVLAMIS- OG EINKJUPENSJÓN V.M.

SKJAL 5

ALMANNASTOVAN
Jónas Broncksgota 27
3800 - Tórshavn - Tlf. 15480

Tann 20. februar 1981.
J.nr. 90-60
(at tilskila í svari)

Upprit

viðvíkjandi broytingum í almannalóggávuni.

1. inngangur: Í hesum uppriti eru frágreiðingar um gongdina og støðuna í málinum um pensiónslógina og forsorgarlógina.

2. Pensiónslóggávan. 2.1. Hetta mál byrjaði við skriv landsstýrisins frá 27. januar 1978 til almannamálaráðið. Skrivið miðaði eisini ímóti eini nýskipan í lóggávuháttinum í ti, at skotið varð upp, at uppskot til broytingar í føroysku lógunum skuldu fylgjast við uppskotunum til broytingar í donsku lógunum.

Almannamálaráðið tók ikki undir við hesum hugskoti. Annars er at hava í huga at uppskotið til broytingar í Danmark, sum lá fyri, síðani varð sera munandi broytt.

Á nevndarfundi í 1978 var avrátt, at Almannastovan skuldi gera ymiskar útrokningar, serliga viðvíkjandi »disponibelt beløb«, ið er tað, sum pensiónisturin hevur eftir, tá skatturin av pensiónini er goldin. Hesar upplýsingar vóru givnar av Almannastovuni í skrivi og »Notat« dagfest 21. august 1978.

Í skrivi dagfest 29. januar 1979 bað almannamálaráðið um fleiri upplýsingar. Í »Notat« dagfest 22. mai 1980 gjørdi Almannastovan útrokningar viðvíkjandi ajourføring og gav í »Notat« dagfest 28. mai 1980 tær umbidnu upplýsingarnar.

Á nevndarfundi tann 4. og 6. juni 1980 var málið umrøtt, og avrátt varð, at almannamálaráðið skuldi gera uppskot.

Í august 1980 kom fram »Notat« dagfest 23. juli 1980 frá almannamálaráðnum, og í tveimum »Notat« dagfest 5. september 1980 og 9. september 1980 setti Almannastovan fram viðmerkingar.

Til nevndarfundirnar 30. september og 1. oktober 1980 vóru býtt út tvey »Notat« dagfest 22. september 1980 og 25. september 1980 frá almannamálaráðnum, umframt tvey upprit (»Boligtillæg« og »Model 5«) frá Almannastovuni. Málið var til drúgva viðgerð, og teir donsku luttakararnir komu við ti boði frá hægri myndugleikum, at meirútreiðslan hjá rikinum ikki kundi fara upp um 9 mill. kr.

árliga (18 mill. kr. tilsamans). Tingingarnar vóru tí mest um, hvussu hesar skuldu býtast (eftir ymiskum »modellum«) millum pensiónsviðbót, grundarupphædd og — eins og í Danmark — byrjandi »javnstilling« av hjúnum og støkum (at hjún tilsamans fáa meira enn 1 1/2 ferðir upphæddina fyri støk).

Orðaskiftið varð tó tarnað av tørvandi bagfrøðisligum upplýsingum og avráttvar, at Almannastovan skuldi royna at útvega hesar, og at almannamálaráðið tá skuldi seta fram nýtt uppskot.

Hesar upplýsingar vóru sendar frá Almannastovuni tann 3. november 1980. Hereftir setti almannamálaráðið í brævi dagfest 5. december 1980 fram »endaligt« uppskot. Hetta er formað sum persónligt bræv til almannastjóran, og er hatta helst tí, Almannamálaráðið var í iva um framferðarháttin, tá landsstýrisskifti var um at verða.

2.2. Støðan nú er so tann, at almannamálaráðið hevur sett fram uppskot um, at upphæddirnar fyri grundarupphædd og pensiónsviðbót fyri støk verða ajourførdar — hækkaðar til somu upphæddir sum í Danmark pr. 1. januar 1979, og at somu upphæddir fyri hjún verða hækkaðar til 150% av upphæddunum fyri støk.

Hetta ber í sær, at byrjað verður ikki við javnstilling millum hjún og støk, og eisini ber tað í sær, at avlamisviðbót, óarbeiðsførisviðbót, røktarviðbót og hjálparviðbót verða ikki — sum annars siður hevur verið — hækkaðar.

Almannamálaráðið hevur (á dýrtíðargrundarlagnum pr. 1. januar 1980) roknað meirútreiðslurnar út til slakar 18,0 mill. kr. árliga, harav ríkiskassin rindar um 8,7 mill. kr. og Føroyar um 9,3 mill. kr., og harav verður mett, at 8,3 mill. kr. verða goldnar av landskassanum og 1,0 mill. kr. av kommununum.

Almannamálaráðið hevur roknað út, hvussu stór ársfólkapensiónin fyri 1981 hevði verið fyri støk og hjún, um uppskotið hevði verið í gildi alt árið og undir ávísum fyritreytum viðvíkjandi pristalshækkingum.

Almannastovan hevur roknað samsvarandi tøl út (á sama hátt sum prístalsjavningin pr. 1. januar 1980) undir somu fyritreytum.

	Verandi lóg	Uppskotið	Hækking kr.	Hækking %
Árspensión fyri støk	26.244	30.345 kr.	4.101	15,6
Árspensión fyri hjún	38.337	45.534 kr.	7.197	18,8

Almannamálaráðið tekur fyrivarni fyri, at uppskotið ikki er lagt fyri ráðharran sjálvan og ikki fyri fíggjarmálaráðið. Almannastovan metir, at hetta ber ikki í sær álvarsligan vanda fyri uppskotið.

Almannastovan mælir til, at landsstýrið tekur av uppskotinum (ella tilboðnum).

2.3. Serliga um barnagjøld v.m. Vanliga barnagjaldið (»Normalbidraget«) er um 3% hægri í Danmark enn í Føroyum.

Barnaviðbøtur til pensiónir v.m. eru sambært lógina á somu hædd sum vanlig barnagjøld.

Tí skal havast í huga, at formligt uppskot um broyting í lógini um barnagjøld v.m. skal setast fram saman við uppskotinum um broytingar í pensiónslógunum.

2.4. Serliga um húsaútreiðslur. Av fyrstan tíð varð frá føroyskari síðu skotið upp, at aftrat hækkingunum annars, skuldi vera heimild at veita serligt uppískoyti vegna húsútreiðslur.

Hvat lógini viðvikir, varð hetta uppskotið háttað so, at heimild skuldi vera at veita persónligt ískoyti til húsaútreiðslur eftir reglum ásettar av landsstýrinum útum tað mark, sum annars er fyri persónligar viðbøtur (4% av útgoldnum grundarupphæddum árið fyri).

Endamálið skuldi vera at javna út tann stóra munin, sum er millum pensiónistar viðvikjandi húsaútreiðslum. Við tí fyri eyga hevur verið hugsað um eina skipan, sum í høvuðsheitum gongur út uppá, at húsaútreiðslurnar verða gjørdar upp og eru hesar serliga rentur og avdráttir og húsabrunatrygging í egnum húsum ella húsaleiga. Opin spurningur er, um brenniútreiðslur skulu íroknast. Ásett verður ein upphædd — í krónum ella sum prosentpartur av pensiónini — sum pensiónisturin sjálvur skal gjalda. Húsaútreiðslur omanfyri hetta mark verða so veittar sum persónlig viðbót til pensiónina, møguliga móti veðhaldi (vegna avdráttinum). Um hús hjá pensiónisti tørvar størri ábøtur, verður viðkomandi vístur til at taka lán og so rokna út sum frammanfyri nevnt.

Slík skipan verður torfør og urbeiðskrevjandi at umsita.

Nakað líknandi er galdandi í Danmark og kallast »Boligydelse«, men eru reglurnar sera umfatandi og greiniligar og bæði óhóskandi og ónýtiligar fyri føroysk viðurskifti.

Hetta er so dottið burtur í seinasta uppskotinum og er orsøkin helst, at almannamálaráðið er sera ivandi við slíka skipan. Í hvussu so er, ber til at rokna við, at tey einki vilja hava at gera við uppírokning av brenniútreiðslum. Haraftrat kemur, at »boligydelse« sum málsøki nýliga er farið frá almannamálaráðnum til íbúðarmálaráðið.

Tí eigur helst at verða umhugsað at veita íbúðarstudning sum føroysk veiting burturav, eins og uppiskoytisveiting til einkjur og brennistudningin.

Ein millumloysn kundi hugsast á fylgjandi hátt: Persónlig viðbót verður veitt eftir frammanfyri nevnda hugskoti og um persónligar viðbøtur tilsamans (fyri húsaútreiðslur og annars) fara út um markið, verður tað írestandi — sum so verður at roknað sum íbúðarískoyti — goldið av landskassanum burturav.

Í løtuni verða langt frá veittar persónligar viðbøtur upp til markið, men eigur at roknast við hægri viðbótum í næstu framtíð, bæði vanliga vegna røktartørv og vegna heilivág og hjálparamboð.

3. Forsorgarlógin:

3.1. Málið var av fyrstan tið nevnt mál um »Færøsk bistandslov«, men seinni er vorðin semja um, at broytingin skal umfata broytingar í føroysku forsorgarlógini.

Málið byrjaði við skrivi dagfest 14. august 1978 frá Almannastovuni.

Á nevndarfundi í september 1979 var semja um at bíða eftir nærri frágreiðing frá Almannastovuni.

Á nevndarfundum 4. og 6. juni 1980 var málið uppaftur tikið, men varð á vitjan almannastjórans í Keypmannahavn í august 1980 avrátt, at almannamálaráðið í staðin skuldi seta fram uppskot í lógarsniði.

Við skrivi dagfest 18. september 1980 sendi almannamálaráðið uppskot til broytingar í forsorgarlógini, og vóru tær mestsum í lógarsniði.

Á nevndarfundi 30. september og 1. oktober 1980 vóru uppskotini umrødd og gingin igjøgnum út í æsir. Úrslitið varð, at almannamálaráðið skuldi seta saman uppskot eftir teimum broytingum, sum umrøddar vóru og harumframt seta upp viðmerkingar, sum í hesum føri verða av serligum týdningi. Avrátt varð eisini viðvíkjandi nøkrum smærri punktum, at almannastjórin skuldi seta fram uppskot til orðaljóð.

3.2. Støðan nú er tann, at tey uppskot v.m., sum almannamálaráðið (og almannastjórin) skuldi gera, eru ikki gjørd.

3.3. Serliga um barnaforsorgarlógina:

Av tí at »bistandsloven« í Danmark eisini fevnir um tað øki, sum barnaforsorgarlógin hjá okkum fevnir um, er eisini gjørt uppskot til broytingar í barnaforsorgarlógini. Tað, sum sagt er um forsorgarlógina, er tí eisini galdandi fyri barnaforsorgarlógina.

20. februar 1981.

SKJAL. TIL LØGTINGSMÁL NR. 32:
VEIÐI, VIRKING OG SØLA AV SVARTKJAFTI, HØGGUSLOKKI OG SKELJAFISKI.

SKJAL 6.

Føroya Løgting.

Til løgtingsins kunningar verður hjálagt sent eitt
NOTAT
viðv.
veiðu av og framleiðslu burtur úr svartkjafti.

FØROYA LANDSSTÝRI, 26. februar 1982

Pauli Ellefsen,
løgmaður.

/

Olaf Olsen,
landsstýrismaður.

FØROYA LANDSSTÝRI
3800 Tórshavn, 25.2. 1982
Telf. 11080, Telex Tingus 81235, Postbox 64
Avgreiðslutíð: Kl. 10-15, leygardag stongt.
PE/ED

NOTAT
viðv.
veiðu av og framleiðslu burtur úr svartkjafti

Á løgtingi og manna millum er vaksandi áhugi fyri veiðu av og framleiðslu burtur úr svartkjafti.

Tað er bert natúrligt, at spurt verður um, hvørjar metingar og ætlanir landsstýrið hevur á hesum øki.

Sitandi landsstýri hevur seinasta árið arbeitt og arbeiðir framvegis við svartkjaftaspurninginum.

Tær kanningar, sum tey seinastu árini eru gjørdar, og úrslitini av teimum íløgum og royndum, sum eru framdar á sjógvi og í landi, vísa, at tað er rætt og neyðugt at halda fram at gera íløgur í hesa veiðu og framleiðslu.

Hin vegin eru úrslitini ikki enn so ítøkilig, at tað er gjørligt at gera eina fasta ætlan yvir tær íløgur, sum skulu fremjast tey komandi árini.

Niðanfyri vístu tøl og viðmerkingar skulu ti bert takast sum hugsanir og metingar um, hvussu gongdin kann bliva, um samlaða myndin viðv. svartkjafti framhaldandi batnar. Og myndin er batnað, sjálvt um igongdverandi virksemir ikki enn vísa nóg góð úrslit.

Verandi myndin av veiðu hjá Gullfinni og framleiðslu hjá Bakkafrost kundi bent á, at veiða av og framleiðsla til matna úr 15.000 tonsum av svartkjaftarávøru geva nóg mikið til skip og virki, um landskassin letur eitt ískoyti uppá 10 til 15 mió. kr.

Úrslitið hjá Giljanesi er heldur ikki nóg gott enn. Tað er sostatt neyðugt at náa hægri søluprísir, at rationalisera og effektivisera bæði veiðu og viðgerð, samstundis sum tað er neyðugt at selja nógv meira av svartkjaftaúrdráttum, um svartkjafturin skal fáa tann týdning, sum vit øll ynskja, og sum nógv av okkum trúgva uppá.

— -- —

Væntandi verður TAC sett á svartkjaft, áðrenn langt frálíður. Í hesum sambandi ætlar landsstýrið at fáa sum mest í okkara part. Hugsa vit okkum, at vit sjálvir koma at veiða 300.000 tons av tí svartkjafti, sum fellur í okkara lut, og restin verður býtt um við aðrar, kundi nýtstan t.d. verðið soleiðis:

		tons
I	Viðgjørt liðugt umborð á verksmiðjutrolarum	100.000
II	Veitt og ført til lands til matframleiðslu	150.000
III	Veitt og ført til lands til idnaðarframleiðslu	50.000
	Íalt	300.000

Burtur úr hesari framleiðslu kundi ein fingið umleið hesar nøgdir í tonsum.

Flak og fars	70.000
Fryst slógv v.m.	80.000
Mjøl og lýsi	35.000
Íalt	185.000

Roknar ein við teimum søluprísum, sum tær smáu nøgdir, sum seldar eru, hava givið, so vildi hetta samsvarað við eitt samlað útflutningsvirði uppá 750 til 800 mió. kr.

I Viðgjørt liðugt umborð á verksmiðjutrolarum, 100.000 tons.
Kundi hugsast veitt og framleitt umborð á hesum skipum. Víst er eisini nettar íløguupphæddir.

	Veiða tons	**Íløgur mió. kr.**
Gilljanes	20.000	10
Umbygt verandi skip	12.000	10
3 nýggir verksmiðjutrolarar	68.000	280
	100.000	300

Omanfyri nevndu skip høvdu havt eina manning umborð uppá minst 250 fólk og høvdu sostatt givið ársinntøku til minst 300 fólk.

II Veitt og ført til lands til matframleiðslu, 150.000 tons.
Kundi hugsast veitt av hesum skipum. Eisini eru víst mett íløgutøl.

	Veiða tons	**Íløgur mió. kr.**
Gullfinnur	20.000	10
4 umbygd verandi størri skip	40.000	20
6 umnygd verandi smærri skip	30.000	10
3 nýggj skip	60.000	120
	150.000	160

Omanfyri nevndu skip høvdu havt eina manning umborð uppá minst 150 fólk og høvdu sostatt givið umleið 200 fólkum ársinntøku.

Tey 150.000 tonsini av rávøru kundu hugsast at verðið viðgjørd partvíst á verandi flakavirkjum og annars á nýggjum svartkjaftavirkjum, sum víst niðanfyri. Íløgutølini eru eisini víst.

	Framleiðsla tons rávøra	**Íløgur mió. kr.**
Verandi flakavirkir	90.000	100
3 nýggj svartkjaftavirkir	60.000	150
Ialt	150.000	250

Verandi framleiðsla á landi vísir, at virkið hevur eina lønarútreiðslu uppá meira enn eina krónu pr. kg. rávøru.

Sjálvt aftaná munandi rationalisering av framleiðsluni kann roknast við, at framleiðsla burturúr 150.000 tonsum av svartkjafti merkir arbeiðsløntir uppá minst 120. mió. kr. Hetta svarar til eina ársløn uppá 120.000 kr. til 1.000 fólk.

III Samlaðar íløgur, rávørunøgd og arbeiðspláss.

Út frá omanfyri standandi hugsanum og fortreytum høvdu íløgurnar og harav standandi arbeiðspláss verðið:

	Rávørunøgd tons	**Íløgur mió. kr.**	**Arbeiðs-pláss**
Verksmiðjutrolarar	100.000	300	300
Skip sum veiða til matna)		160	200
Verandi flakavirkir)	150.000	(100	1.000
Nýggj svartkjaftavirkir)		(150	
Skip sum veiða til iðnað	50.000	15	50
Ialt	300.000	725	1.550

Herumframt má roknast við íløgum hjá tí almenna í havnaanlegg v.m. í samband við nýggj svartkjaftavirkir og útbygging av verandi flakavirkjum.

Eisini má roknast við útbygging av frysti- og køligoymsluka pasiteitinum á landi út yvir omanfyri nevndu bygging og útbygging av virkjum.

Talan er sostatt um samlaðar íløgur upp móti eina milliard krónur.

Íløgurnar uppá 725 mió. kr. eru umframt tær íløgur, sum longu eru gjørdar í Giljanes, Gullfinn, Bakkafrost og verandi skip og virkir.

Av teimum 725 mió. kr. viðvikja tær 475 íløgur í skip, og tær 250 mió. kr. íløgur í virkir. Viðgangast má, at figgingarmøguleikarnir viðv. íløgum í virkir ikki eru so

góðir sum viðv. skipaíløgum. Hesin spurningur verður nærri kannaður og viðgjørdur.

Tey vístu íløgutølini eru mett uttan nóg nágreiniligar kanningar.

Landsstýrið hevur samtykt at heita á serfrøðingar um at kanna nøkur verandi flakavirki viðv. neyðugum útbyggingum til svartkjaftaframleiðslu.

IV Samantak

Sum nevnt frammanfyri er ikki gjørligt at gera eina fasta ætlan yvir tær íløgur, sum landsstýrið fer at viðmæla at fremja.

Giljanes og Gullfinnur eru í vinnu. Framleiðsluorkan á landi er ov lítil í mun til veiðuorkuna hjá Gullfinni og má útbyggjast sum allarskjótast.

Umbygging av verandi skipum og útbygging av verandi flakavirkjum eiga annars at verða framdar í tann mun, útlitini tala fyri hesum.

Viðmælið til bygging av fyrsta nýggja verksmiðjutrolaranum verður væntandi givið innan leingi.

Nær byggingin av fyrsta nýggja svartkjaftavirkinum kann byrja, avhongur í stóran mun av figgingarmøguleikunum. Væntandi verður tað lættari at fáa figging til fyrsta verksmiðjutrolaran enn til fyrsta nýggja svartkjaftavirkið.

Samanumtikið kann sigast, at tað eftir øllum at døma er gjørligt at fiska nógv av svartkjafti við Føroyar.

Tað er eisini gjørligt at framleiða matvørur burtur úr svartkjafti. Bæði veiða og viðgerð undir fortreyt av, at neyðugar íløgur verða gjørdar.

Eftir stendur, um tað er, og nær tað verður gjørligt at selja nóg mikið av svartkjaftaúrdráttum til so góðan prís, at allar nevndu íløgur eiga at gerast.

Landsstýrið fer framhaldandi at fylgja við og at arbeiða við svartkjaftaspurninginum og fer at kunnuga løgting og almenning um gongdina í hesum máli.

Tórshavn, 25. februar 1982.

Pauli Ellefsen
løgmaður

Olaf Olsen
landsstýrismaður

Skjal til løgtingsmál nr. 67: Skjal 7
Broyting í ferðslulógini.

Viðmerkingar til lógaruppskotið

Almennar viðmerkingar.

Tann nevnd, sum landsstýrið við skrivi frá 3. august 1977 setti at endurskoða ferðslulóggávuna, hevur hesar limir:

Bileftirlitsmaður Atli Jensen, bileftirlitið.
Verkfrøðingur Jógvan Nolsøe, landsverkfrøðingsskrivstovan.
Fulltrúi Jalgrim Hilduberg, landsskrivstovan.
Olivur Næss, Ráðið fyri ferðslutrygd.
Landfúti M. Nepper Christensen (formaður)

Herumframt eru nøkur av samstarvsfólki fútans uppi í nevndararbeiðinum.

Við løgtingslóg nr. 66 frá 18. oktober 1978 vórðu gjørdar fleiri broytingar í ferðslulógini. Broytingarnar snúðu seg m.a. um:

1) heimild hjá landsstýrinum til at áseta reglur um forboð fyri at flyta inn og handla við átbúningi og tilhoyri til akfør og persónliga trygdarútgerð til førara og ferðafólk,
2) endurskoðan av ásetingunum um ferð,
3) endurskoðan av ásetingunum um vikiskyldu,
4) nýggjar reglur um skyldur móti gangandi fólki,
5) endurskoðan av reglunum um steðg og parkering,
6) nýggjar reglur um breidd, longd og hædd á akførum,
7) nýggjar reglur um vekt av akførum,
8) broyttar reglur um samankopling og sleip,
9) reglur um nýtslu av fallhjálmi,
10) broyttar reglur um ferðsluskipan og ferðsluavmerkingar,
11) broyttar reglur um vegmerking.

Við løgtingslóg nr. 40 frá 1. juni 1979 vórðu hesar broytingar gjørdar:

1) endurskoðan av reglunum um neyðsendarkoyring.
2) størri atgongd til at avgera brot á reglurnar fyri steðgi og parkering við at leggja sekt á,
3) áseting av reglum um atgongd hjá løgregluni til at flyta burtur akfør.

Við løgtingslóg nr. 57 frá 12. mai 1980 vórðu ásetingarnar um koyring við kenning munandi broyttar, m.a. varð ásett fast promillumark við 0.80 0/00.

Hesar kunngerðir eru givnar:

1) kunngerð nr. 52 frá 31. juli 1978 um parkeringarspjøldur,
2) kunngerð nr. 103 frá 6. desember 1978 um forboð fyri at flyta inn og selja stilliútgerð til prutl,
3) kunngerð nr. 105 frá 18. desember 1978 um fatlhjálmar,
4) kunngerð nr. 10 frá 12. februar 1979 um ávísar ferðslutalvur,
5) kunngerð nr. 17 frá 9. mars 1979 um størstu breidd, longd, hædd, vekt og ástrýst hjá akførum,
6) kunngerð nr. 60 frá 2. august 1979 um neyðsendarkoyring,
7) kunngerð nr. 61 frá 2. august 1979 um upptøku og sølu av akførum,
8) kunngerð nr. 83 frá 6. november 1979 um gjald fyri ólógliga at steðga og parkera,
9) kunngerð nr. 75 frá 17. juni 1980 um vegmerking.

Hesar kunngerðir eru í umbúnað:

1) kunngerð um skrásetting av motorakførum,
2) kunngerð um tilgerð og útgerð av akførum,
3) kunngerð um samankopling og sleip,
4) kunngerð um nýtslu av ávaringartríhyrningi og ljósblunki til at siga frá skaða.

Hetta uppskotið hevur hetta innihald:

1) endurskoðan av reglunum fyri tilgerð og útgerð av akførum, § 1, nr. 1-3,
2) áseting av reglum, sum ger tað revsivert aftan á koyring, sum hevur havt samband við óhapp, at njóta rúsdrekka, § 1, nr. 4-6,
3) broyting av reglunum um skyldur, tá ferðsluóhapp er, § 1, nr. 8,
4) áseting av forboði fyri at steðga og parkera við bíðistøð hjá bussum, § 1, nr. 9-11, og nr. 17,
5) endurskoðan av reglunum um lyktaljós § 1, nr. 12-15,
6) serligar reglur um atgongd hjá løgregluni at taka førararættin frá ungdómum fyri brot á ferðslureglurnar, § 1, nr. 19, sbr. nr. 7 og nr. 16.

Endiliga hevur nevndin í umráði at endurskoða ásetingarnar um koyrilæru og koyrilærarar.

Sum av hesum frammanfyri sæst, hava fleiri broytingar verið gjørdar í ferðslulóggávuni, sum hava avgerandi týdning fyri trygdina í ferðsluni. Hvussu hesar ásetingar fara at roynast, er eina mest treytað av tí, um nóg góð upplýsing verður givin um innihald teirra og ætlanina við teimum. Nevndin metir, at higartil hevur

ikki upplýsingin verið nóg góð, og mælir til, at meiri peningur verður játtaður til tað upplýsingararbeiði, sum ráðið fyri ferðslutrygd ger.

Viðmerkingar til tær einstøku ásetingar.

Til § 1, nr. 1

Tann broytingin, sum er skotin upp, er teknisk og er at líta á í sambandi við tær broytingar, sum skotið er uppá í § 1, nr. 2-3. Í ti donsku ferðslulóggávuni, her uppi í tær samhært ferðslulógini givnu kunngerðir, verða »bil« og »motorvogn« nýtt við somu merking. Skulu tær donsku kunngerðirnar um tilgerð og útgerð av akførum og um gjøllari fyriskipanir um akfør í vissan mun — sum nevndin hevur skotið upp, sbr. viðmerkingarnar til § 1, nr. 2-3,- kunnu nýtast her í landinum, er tann broyting, sum mælt er til, neyðug.

Til § 1, nr. 2-3.

Reglurnar um tilgerð og útgerð av akførum verða í stóran mun ásettar í kunngerðum frá fyrisitingini. Á henda hátt ber til at broyta og laga reglurnar skjótt, tá ið gongdin ger tað neyðugt.

Tær fyrisitingarliga settu reglur eru kunngerð nr. 49 frá 20. september 1967 um tilgerð og útgerð av akførum (útgerðarkunngerðin), sum hon er broytt við kunngerð nr. 6 frá 14. februar 1973 og kunngerð nr. 9 frá 16. februar 1973. Í kunngerð nr. 82 frá 13. desember 1963, sum hon er broytt til kunngerð nr. 43 frá 27. juni 1966, kunngerð nr. 26 frá 2. apríl 1974 og kunngerð nr. 102 frá 4. desember 1980 eru ásettar serligar reglur fyri prutl, í kunngerð nr. 4 frá 27. januar 1967, sum hon er broytt við kunngerð nr. 28 frá 19. august 1972 eru serligar reglur ásettar fyri motorakfør og vinnuligan fólkaflutning, og í kunngerð nr. 81 frá 10. november 1970 og kunngerð nr. 69 frá 13. november 1976 eru ásettar reglur um nýtslu av píkaketu og píkadekki.

Útgerðarkunngerðin frá 1967 er gjørd eftir teimum ásetingum, sum tá høvdu gildi í Danmark (kunngerð nr. 198 frá 24. juni 1955 við broytingum). Í donsku útgerðarkunngerðini hava í árunum eftir 1967 verið gjørdar nógvar broytingar kravdar av gongdini. Danska kunngerðin frá 1955 er nú avloyst av kunngerð nr. 154 frá 20. apríl 1977 við broytingum.

Hóast gongdina er útgerðarkunngerðin frá 1967 ikki endurskoðað og er tískil ótíðarhóskandi. Bileftirlitið hevur í fleiri førum — eisini fyri nevndini — biðið um, at hesar reglur, ið eru av stórum týdningi fyri ferðslutrygdina, verða førdar til dags.

Í hesum sambandi skal verða havt á orði, at núgaldandi danska útgerðarkunngerð er gjørd eftir tað, at Danmark hevur samtykt tann sáttmála, sum limir í figgjarnevndini hjá ST fyri Europa gjørdu 20. mars 1958 viðvikjandi lógfesting av samlikum treytum fyri góðkenning og sínámillum viðurkenning av útgerð og luttum til

motorakfør. Við Danmarkar staðfesting av sáttmálanum er eftir brævaskifti við landsstýrið tikið fyrivarni viðvikjandi Føroyum.

Nevndin hevur við hesum í huga havt í ráði spurningin um at taka upp nýggjar reglur um tilgerð og útgerð av akførum, og tær broytingar, sum upp eru skotnar, er úrslitið av hesum umráðingum.

§ 10 byrjar við í samsvari við galdandi § 10, 1. stk., at heimila landsstýrinum at áseta reglur um tilgerð og útgerð av akførum o.a.m. Tær knøppu forskriftir um útgerð í §§ 5-9 í ferðslulógini verður mælt til at taka av. Øll krøv viðvikjandi tilgerð og útgerð verða higanífrá at avgera fyrisitingarliga.

Í § 10, 1. stk., 2. pkt., verður heimilað landsstýrinum at gera av, at tær kunngerðir, sum løgmálaráðið í Danmark sambart ferðslulógini hevur givið um gjøllari forskriftir fyri tilgerð og útgerð av akførum, skulu galda í øllum ella fyri ein part her á landi. Tær umrøddu kunngerðir verða undantiknar lýsing.

Nevndin skjýtur upp, at samsvarandi teirri skipan, sum hevur gildi í Danmark, verða givnar tvær kunngerðir um tilgerð og útgerð av akførum:

1) ein eginlig útgerðarkunngerð, sum inniheldur bara útgerðarreglur, og sum snúgvar sær til borgararnar yvirhøvur,
2) ein kunngerð um gjølligar tekniskar fyriskipanir um tilgerð og útgerð av akførum, og sum hevur tær gjølligari reglur, sum ikki tørvar borgarunum at fáast við dagliga, og sum serliga hava áhuga hjá bileftirlitinum og starvsgreinini.

Tann útgerðarkunngerð, sum nevnd er undir 1), eigur eftir hugsan nevndarinnar so nógv sum gjørligt at verða orðað í samsvari við ta donsku útgerðarkunngerðina.

Nevndin heldur, at tað fer ikki at vera gjørligt at gera serliga føroyska kunngerð um gjølligar forskriftir um tilgerð og útgerð av akførum sum nevnt undir 2), og vísir á, at kunngerð um hetta í Danmark verður givin á hvørjum ári, og at hon er ógvuliga greinilig. Nevndin skjýtur tí upp, at landsstýrið fær heimild til at áseta at tær í Danmark hvørja og cina tið galdandi kunngerðir um gjølligar forskriftir um tilgerð og útgerð av akførum í øllum ella fyri ein part skulu galda her á landi. Av tí, at kunngerðirnar sum nevnt eru ógvuliga greiniligar og verða givnar á hvørjum ári, verður harumframt skotið upp, at kunngerðirnar verða undantiknar lýsing í tí góðkenda lýsingablaði. Her skal verða lagt aftrat, at hesar kunngerðir í Danmark eru undantiknar lýsing í lógtíðindi. Í teirri kunngerð, har sum landsstýrið setur ta donsku kunngerðina í gildi, verður sagt frá, hvar ein skal snúgva sær fyri at fáa kunngerðina.

§ 10, 2. stk., sum heimilar landsstýrinum at seta forboð fyri at flyta inn og selja ávísa útgerð og tilhoyr til akfør o.a.m. er óbroytt.

§ 10, 3. stk., sum heimilar landsstýrinum fyri ferðslutrygdar sakir at forbjóða at nýta akfar, sum annars lýkur tær ásettu reglur um útgerð, er nýtt. Løgmálaráðið í

Danmark verður ofta fyri – vanliga heimagjørdum — akførum, ið kanska ikki beinleiðis bróta nakra reglu fyri útgerð, men sum kortini eru ivasom fyri ferðslu trygdina. Reglan gevur møguleika til at forbjóða at nýta slíkt akfar. Reglan fer helst ógvuliga sjálvdan at verða nýtt her á landi, men er tikin við sum almenn algerð og fyri at fáa fult samsvar við útgerðarreglurnar í teirri donsku ferðslulógini.

Til § 1, nr. 4-6.

Sum nevnt í almennum viðmerkingum vórðu við løgtingslóg nr. 57 frá 12. mai 1980 framdar broytingar í lógarásetingunum um koyring við kenning. Lógaruppskotið varð sett fram av landsstýrinum sambæri endurskoðan nevndarinnar av hesum ásetingunum. Broytingarnar ásettu fast promillumark við 0,80 0/00, skilnað millum promillukoyring og koyring við kenning, tað revisverda økið fyri koyring við kenning varð víðkað, og sakarmálsviðgerðin einfaldað.

Í áliti frá 21. apríl 1980 lagt fram av lógarnevnd løgtingsins verður m.a. flatt fram:

> »Undir fyrstu viðgerð á tingi eins og undir nevndar viðgerðini varð ført fram, at uppskotið ikki bøtti um teir tvørleikar, ið standast av, at summir bilførarar rýma frá staðnum, tá skaðatilburður er hendur og siga seg at hava drukkið aftaná. Vist hevur m.a. verið til norsku ferðslulógina, hereftir bilførarar verða revsaðir fyri at hava drukkið inntil 6 tímar aftaná skaðatilburðin.
>
> Lógarnevndin hevur havt fund við serligu ferðslunevndina undir landsstýrinum ella arbeiðsbólkin, ið hevur gjørt uppskotið. Føroya landfúti, ið er formaður í hesum arbeiðsbólki førdi fram eins og tað stendur í uppskotinum, at nevndin metir hetta arbeiðið sum ein part av ti setningi, ið landsstýrið hevði álagt, og at arbeitt verður viðari við seinna parti av málinum sum m.a. eisini viðvíkjandi spurninginum um 6 tíma regluna úr Noreg. Fört var fram, at uppskotið var ein skerping av verandi lóg, eins og tað var ein einfaldgering og effektivisering. Upplýst var eisini, at sorinskrivarin tekur undir við uppskotinum og gevur ti sítt viðmæli.
>
> .....
>
> Ein samd lógarnevnd tekur undir við uppskotinum og heitir samstundis á Føroya landsstýri og biður um at bera so í bandi, at seinni partur av broytingunum í ferðslulógini verður lagdur fyri tingið til komandi tingsetu.«

Í viðmerkingum nevndarinnar til tað gjørda uppskotið til broyting í áseltingunum í ferðslulógini um koyring við kenning, sum varð sent landsstýrinum tann 6. desember 1979, og sum varð framt við omanfyri nevndu løgtingslóg nr. 57 frá 12. mai 1980, verður m.a. flutt fram, »at nevndaruppskotið ikki loysir tað vandamál, sum gerst í summum førum, bar ið ein ákærdur sigur seg at hava drukkið rúsdrekka aftan á koyringina. Men nevndin umhugsar at skjóta upp, at fáa í lag eina áseting,

sum í ávísum førum ger tað revsivert at drekka rúsdrekka aftan á koyringina. Nevndin er ikki liðug við umráðingar sínar.«

Nevndin hevur nú endað umráðingarnar, og ásetingarnar, sum skotið er upp í § 1, nr. 4-6, er úrslitið av hesum umráðingum.

Vandamálið er, sum nevnt omanfyri, tað, at førarar av motordrivnum akfari, sum hava koyrt í slíkum umstøðum, at grund er til at skuldseta teir fyri promillukoyring ella koyring við kenning, í summum førum siga, at teir hava drukkið rúsdrekka aftan á koyringina, og at blóðroyndin tí ikki er nýtilig til metingar av alkoholkoncentratiónini, meðan koyrt varð. Henda frágreiðing kann vera sonn ella ósonn, borin fram til tess at royna at sleppa undan sakarábyrgd. Í báðum førum ger hetta málið torførari at greiða, og um tað er satt, sum fram er hildið, ger henda drekkingin tað ógviliga torført at meta um alkoholkoncentratiónina, tá ið koyrt varð.

Tað er rættarvenja, at tá ið framhildið verður, at tann funna alkoholpromilla stendst av rúsdrekka nomið aftan á koyringina, kann hetta verða góðtikið av dómstólunum, um ávisur stuðul fæst fyri, at hetta er satt, herimillum frágreiðing við sambæriligari grundgeving. Serliga í teimum førum, tá ið hetta verður framhildið á einum seinni stigi í sakarmálsviðgerðini, hava dómstólarnir verið ivingarsamir um rætt er framhildið. Mát, har ið hetta verður hildið fram, kunnu gerast torgreidd, við tað at tann ákærdi við vitnisførslu fer at royna at sanna á tað, sum er framhildið.

Sjálvandi verður eitki vandamál í teimum málum, har sum tann ákærdi verður steðgaður av løgregluni og beinan vegin handtikin. Eisini í øðrum førum fara umstøðurnar í sambandi við skuldsetingina at vera slíkar, at ikki ber til at bera fram slíka frágreiðing.

Nevndin hevur umhugsað, um tað eigur at verða roynt at loysa tað nevnda vandamálið við at áseta, at njóting av rúsdrekka aftaná koyringina í ávísum førum verður gjørt til serstakan revsiverdan atburð.

At nýta í hesum umráðingum hevur nevndin fingið upplýsingar um rættarstøðuna í Noregi, Svøríki og Danmark.

Noregi.

Í norsku ferðslulóggávuni er ein áseting, sum í ávísum førum ger tað revsivert at njóta rúsdrekka aftan á koyringina.

Vegtrafikkovens § 22, 2. led.:

»Fører av motorvogn må ikke nyte alkohol eller ta annet berusende eller bedøvende middel i de første seks timer etter at han er ferdig med kjøringen, når han forstår eller må forstå at det kan bli politietterforskning på grunn av kjøringen. Dette forbudet gjelder likevel ikke etter at politiet har latt lege ta blodprøver eller har avgjort at blodprøve ikke skal tas.«

Revsimarkið fyri at bróta hesa áseting er tað sama sum fyri koyring við kenning, eins og reglurnar fyri at taka førararættin frá einum eru tær somu sum fyri koyring við kenning.

Ein norskur fúti hevur um ættarvenju upplýst hetta:

»Ættarvenja vísir greidliga, at tað er fongsulsrevsing, sum verður nýtt fyri brot á § 22, 2. stk., í vegferðslulógini. Tað er kortini reiðiliga vanligt við treytaðari revsing saman við sekt. Treytaleys fongsulsrevsing má kortini sigast at vera meginreglan, við tað at tað má tykjast at vera upp á seg heldur lítið at brigda tí dømda viðvíkjandi njótingini av rúsdrekka aftaná, um hann skal kunna fáa treytaða revsing. Ein dómur sýnist at vísa, at tað einans kann vera grundarlag fyri treytaðum dómi, um bilstjórin heldur ikki aftan á koyringina hevur havt meiri enn 0,50 0/00. (Í Noregi er fast miðari promillumark 0,50 0/00). Hægstiættur hevur í dómi sagt, at við alkoholnýtslu aftaná eigur vanlig treytaleys fongsulsrevsing at verða nýtt, tá ikki serligar umstøður eru til.«

Ásetingin varð sett í norsku motorvognalógina í 1959 sambart uppskoti frá »Edruclighetskomiteen af 1947« og varð samtykt at hava óbroytta í Vegtrafikloven frá 1965.

Í fyrireikingararbeiðinum til ásetingina verður m.a. flutt fram:

»En annen vesentlig svakhet ved gjeldende lov består deri, at motorvognføreren, når han er anholdt mistenkt for påvirkning, til sin unnskyldning hevder, at han har nytt alkohol etter at kjøringen *er avsluttet*, og at det er denne alkoholnytning, som har medført påvirkningen. En slik alkoholnytning, som faktisk har funnet sted, vil under ingen omstendighed medføre noen fare for trafikksikkerheten. Men for å hindre, at beviset for motorvognførerens tilstand på et tidligere tidspunkt skal kunne ødelegges ved at han nyter alkohol etter kjøringen eller ved en påstand om dette (som politiet ofte ikke kan motbevise), har *komiteen* samstemmig funnet å måtte foreslå innført et uttrykkelig *forbud mod slik nytning av alkohol etter trafikulykker m. v.*

Komiteen er merksam på at det forbud som her innføres, strider mot det vanlige princip i straffelovgivningen om at gjerningsmannen selv straffritt kan undra eller ødelegge beviser i egen sak, jfr. straffelovens § 132. En står imidlertid når det gjelder promille-kjøring overfor bevisvansker av rent spesiell art. Disse gjør nødvendig særlig foranstaltninger fra lovgivningens side. En viser i denne forbindelse til trafikkreglens § 45, post 2, som har lovfestet en plikt til for motorvognførere å gi melding til politiet innen 24 timer om trafikkulykke, en regel som antas å gjelde selv om motorvognføreren er den skyldige i overtredelse av trafikklovgivningen«.

Tað sæst framvegis av fyrireikingararbeiðinum, at norski ríkisakæran var ímóti at løgfesta áseting, sum sjálvstøðug ger tað revsivert at njóta rúsdrekka aftan á koyr-

ingina, meðan samferðsludeildin og løgmáladeildin meintu, at hesin atburður átti at gerast revsiverdur í sambandi við njóting av rúsdrekka aftan á koyring, sum hevur havt ferðsluóhapp við sær.

Oddamenn í norsku løgregluni hava sagt um vegtrafikloven § 22, 2. stk., at hon lættir munandi um arbeiðið hjá løgregluni. Tað er nógv lættari at samprógva nakað, og reglan undirstrikar og ger, at tað er burturvið ikki at greiða rætt frá rúsdrekka-njótingini. Tað slepst undan hópin av fridømingum fyri koyring við kenning. Uttan hesa reglu kundi verið vandi fyri, at framd verða einans mál, har ið tann, sum av varðar, verður tikin við stýrið. Dómstólarnir í Noregi hava lítlan hug at góðkenna sum fellandi prógv vitnisfrágreiðingarnar um, hvørt hesin tóktist hava kenning.

Svøriki.

Ein áseting, sum sjálvstøðug ger tað revsivert at njóta rúsdrekka aftan á koyringina, fekk gildi í Svøriki tann 1. januar 1976. Ásetingin, sum er innsett sum 4 a § í lóg um revsing fyri ávis ferðslumisbrot, hevur hetta orðaljóð:

> »Den som efter att ha fört motordrivet fordon förtär alkohol eller annat medel som avses i 4 § 1 mom. första stycket och som därvid inser eller har skälig anledning antaga att färden kan föranleda undersökning om brot enligt 4 § och att färtäringen kan försvåra undersökningen om sådant brott, dömes till dagsböter eller fängelse i högst sex månader. Ansvar må dock ej ådömas den som i anledning av färden dömes till ansvar enligt 4 §.«

Ásetingin í 4 § viðvíkur koyring við kenning.

Revsimarkið fyri at bróta hesa áseting er tað sama sum fyri koyring við kenning. Nevndin er ikki kunnug við svenska rættarvenju, her uppi í um brot á ásetingina ber við sær, at førararættarin verður tikin.

Fyrireikingararbeiðið til ásetingina er álit, sum »kommitén för lagstiftningen angående trafiknykterhetsbrott« hevur lagt fram í 1970, her m.a. verður sagt:

> »Såsom framgår av de överväganden som har gjorts i det föregående är det från principiell synspunkt inte helt tilltalande at införa en bestämmelse av innebörd at man kriminaliserar som ett särskilt brott sådan efterförtäring som försvårar utredningen om trafiknykterhetsbrott. Emellertid finns redan förut i lagstiftningen exempel på at misstänkts åatgärder för at skydda sig själv från upptäckt kan föranleda ansvar. Det går inte heller att förneka att det finns ett inte obetydeligt praktisk behov av at kriminalisera sådan efterförtäring som här avses. Detta har också vitsordats av åatskilliga remissinstanser vid behandlingen av 1957 års kommités betänkande. Kommittén har därför för remissinstansernas granskning ansett sig böra lägga fram et forslag om en sådan kriminalisering.

Det närmare innehållet i en bestämmelse om efterförtäringsbrott kommer att behandlas i det följande.«

Danmark.

Danska ferðslulógin hevur onga áseting, sum ger tað revsiverd at nýta rúsdrekka aftan á koyringina.

Spurningurin um slíka áseting er viðgjørdur í álíti um motorførarar við kenning, sum tann ferðslunevnd, ið løgmálaráðið setti tann 18. mai 1966 hevur lagt fram (álit nr. 515/1969).

Í álitinum verður m.a. tikið fram:

»For at modvirke forsøg på at hindre efterforskningen har man i Norge indført en bestemmelse, hvorefter det er strafbart at indtage alkohol eller andet berusende eller bedøvende middel i de første 6 timer efter kørslen, når den pågældende forstår eller må forstå, at der kan blive politiefterforskning på grund af kørslen.

Kommissionen har overvejet, om der bør stilles forslag om gennemførelse af en tilsvarende bestemmelse, eventuelt således at det gøres strafbart at indtage spiritus efter afslutningen af en kørsel, hvis føreren må forstå, at der kan blive tale om politimæssig undersøgelse for kørsel i spirituspåvirket tilstand.

Der kan imidlertid rettes principielle indvendinger imod en sådan regel, ligesom dens effekt vil være tvivlsom.

Når bortses fra bestemmelsen i færdselslovens § 29 om forpligtelser ved færdselsuheld, er det gældende dansk ret, at en sigtet ikke alene kan undlade at medvirke til sagens opklaring, f.eks. nægte at udtale sig, men også straffrit kan modvirke undersøgelsen. Han kan således ikke straffes for urigtig forklaring i retten eller for at bortskaffe eller tilintetgøre bevismidler.

Overtrædelse af en bestemmelse som den nævnte måtte formentlig belægges med en meget hård straf, for at der kan opnås den nødvendige prævention. Imidlertid vil der ikke med rimelighed kunne blive tale om en lige så hård straf som for kørsel i spirituspåvirket tilstand og næppe højere straf end bødestraf. Hvis en person, der har overtrådt færdselslovens § 16, stk. 1, herunder i dens forslåede nye formulering, mener, at hans eneste chance for at undgå påtale er at indtage spiritus efter kørslen, kan en bestemmelse som den skitserede næppe afholde ham fra at gøre det, da bestemmelsen kun vil medføre en ringere straf end straffen for det forhold, han eftersøges for, ligesom der ikke vil blive tale om frakendelse af førerretten. Kan han, skønt han har indtaget spiritus efter kørslen, alligevel dømmes for spirituskørsel, vil den nævnte bestemmelse ikke få selvstændig betydning ved strafudmålingen.

Kommissionen mener herefter, at en bestemmelse som den nævnte ikke bør indføres.«

Spurningurin er somuleiðis viðgjørdur í áliti frá revislógarráðnum um motorførarar við kenning, (álit nr. 588/1970).

Í álitinum verður m.a. sagt:

»Som det fremgår af 1969-betænkningen side 54-55, har færdselssikkerhedskommissionen overvejet, om der bør stilles forslag om gennemførelse af en bestemmelse, hvorefter der gøres strafbart at indtage spiritus efter kørsel, hvis føreren må forstå, at der kan blive tale om en politimæssig undersøgelse for kørsel i spirituspåvirket tilstand.

Ifølge den norske vegtrafikklovs § 22 andet led er det strafbart at indtage alkohol eller andet berusende middel i de første 6 timer efter kørslen, når den pågældende forstår eller må forstå, at der kan blive politiefterforskning på grund af kørslen. Ifølge oplysning fra det norske justitsdepartement ligger det årlige antal sager, i hvilke der rejses tiltale efter den nævnte bestemmelse, på omkring 21-25. I sager, hvor det er usikkert, når sigtede har drukket, rejses der normalt tiltale både for spirituskørsel, vegtrafikklovens § 22 første led og for indtagelse af spiritus efter kørslen, vegtrafikklovens § 22 andet led (alternativ).

Sanktionerne for overtrædelse af det norske forbud mod indtagelse af spiritus efter kørslen er fængselsstraf eller bøde. Dertil kommer administrativ indtagelse af førerretten i mindst 1 år.

Det er straffelovrådet bekendt, at den svenske trafiknykterhetsbrottskommitté har fundet det rigtigst at fremlægge et forslag om efterfølgende indtagelse af spiritus svarende til den norske regel til overvejelse for de svenske myndigheder.

Den danske færdselssikkerhedskommission er imidlertid bl.a. af principielle grunde veget tilbage fra at foreslå en regel som den nævnte optaget i færdselsloven. Man har således bl.a. henvist til, at det bortset fra bestemmelsen i færdselslovens § 29 om forpligtelser ved færdselsuheld er gældende dansk ret, at en sigtet ikke alene kan undlade at udtale sig, men også straffrit kan modvirke undersøgelsen imod ham.

Kommissionen har endvidere henvist til, at overtrædelse af en bestemmelse om efterfølgende indtagelse af spiritus formentlig måtte belægges med en meget hård straf, for at den nødvendige prævention kan opnås. Imidlertid vil der efter kommissionens mening ikke med rimelighed kunne blive tale om lige så hård straf som for kørsel i spirituspåvirket tilstand, og næppe højere straf end bødestraf.

Selv om en regel som den norske må antages at være egnet til at modvirke ikke blot faktisk indtagelse af spiritus efter kørslen, men også usande påstande herom, og således vil kunne lette efterforskningen, er straffelovrådet enigt i, at at en bestemmelse som den nævnte af de anførte grunde ikker bør søges indført i dansk ret.«

Nevndin hevur haraftrat fingið sær upplýsingar frá ákæruvaldinum um, hvussu ofta tað hevur verið framhildið, at rúsdrekka er notið alfan á koyringina, í teimum málum, sum ákæruvaldið hevur viðgjørt í árunum 1978 og 1979 um koyring við kenning, og hvørja ávirkan hetta hevur havt á úrslitið av sakarmálinum.

Ákæruvaldið hevur givið hesar upplýsingar:

	1978	1979
Talið á málum	143	140
Mál, har handtøka er farin fram beinleiðis í samband við koyringina, og tíðskil ikki hevur borið til at standa upp á njóting av rúsdrekka aftaná	71	82
Onnur mál	72	58
Mál, har fram er hildið, at rúsdrekka er notið aftaná	24	13
Mál, har framhalding av rúsdrekkanýtslu aftaná hevur borið við sær fríðøming ella, at málið er lagt til viks	12	5
Mál, har framhalding av rúsdrekkanýtslu aftaná hevur ávirkað revsingarmátið	5	1
Mál, har framhalding av rúsdrekkanýtslu aftaná hevur verið afturrikin	7	7

At fáa áseting, sum ger rúsdrekkanýtslu aftaná koyringina revsiverda, inn í ta føroysku ferðslulógina møtir sama iva í høvuðsspurningum, sum kemur fram í umráðingunum í Noregi, Svøriki og Danmark. Hesar umráðingar hava, sum frammanfyri nevnt — í Noregi og Svøriki borið við sær, at har eru lógboð samtykt, meðan teir í Danmark ikki hava viljað gjørt rúsdrekkanýtslu aftaná revsiverda.

Nevndin heldur, at her á landi eru serligar grundir til at áseta reglur, sum í høvuðsdráttum svara til ta norsku regluna í vegtrafiklovens § 22, 2. stk.

Tað sæst av upplýsingunum frá ákæruvaldinum, sum frammanfyri eru endurgivnar, at vandamálið ikki er lítilsvert, tá framhildið verður, at rúsdrekka er notið aftaná koyringina. Tað tykist tí í royndum at vera tørvur á tí at gera rúsdrekkanýtslu aftaná revsiverda.

Tað kann haraftrat vera grund til at taka fram, at soleiðis sum — serliga ung dómar fara um við rúsdrekka — til dømis, at rúsdrekka ofta verður havt við í vognínum, og at rúsdrekka ofta er havt við, tá ið er farið verður í dans, — ger hetta, at vandamálið í málum, har framhildið verður, at rúsdrekka er notið aftan á koyringina, ofta er øðrvísi enn í Danmark. Av tí at øðrvísi er farið um við rúsdrekka, er ofta líkari til, at satt er framhildið. Hetta ger tað torførari at viðgera málini.

At enda má verða tikið við í umráðingunum, at teir motorførarar, sum hava verið uppi í óhappi, og sum rýma frá óhappsstaðnum uttan at taka lut í teimum tiltøkum, sum óhappið elvir til, og uttan at boða løgregluni frá óhappinum, eru rættiliga nógvir, smb. viðmerkingarnar til § 1, nr. 8. Í hesum førum fer ofta at vera ilfgrunt um promillukoyring ella koyring við kenning. Ein áseting, sum ger njóting av rúsdrekka aftan á koyringina revsiverda, gevur løgregluni ununandi betri møguleikar til at gera uppsókn í hesum málum.

Nevndin er tí samd um at skjóta upp, at ásettar verða reglur, sum í ávísum førum gera rúsdrekkanjóting aftan á koyringina til revsiverdan atburð í sjálvum sær.

Grundarlagið undir orðingini av teimum reglum, sum skotið er upp at áseta, hevur verið reglan í norsku vegtrafiklov § 22, 2. stk.

Tær ásetingar, sum skotið er upp, skilja frá norsku regluni í tveimum høvuðslutum:

1) Eftir norsku regluni er tað revsivert yvirhøvur at njóta rúsdrekka í tí umráðandi tíðarbilinum aftan á koyring, sum hevur farið fram undir teimum umstøðum, sum tilskilaðar eru í ásetingini.

Nevndin heldur tað vera ósamsvarandi, sjálvum sær heilt at banna rúsdrekkanjóting aftan á koyringina, av tí, at koyring aftaná njóting av rúsdrekka vanliga einans er revsiverd, tá ið njótingin hevur verið so nógv, at alkoholkoncentratiónin í blóðinum fer upp um 0.80 0/00.

Nevndin skjýtur tí upp, at revsiverdur atburður verður treytaður av tí, at tað aftan á koyringina verður notið so nógv rúsdrekka, at alkoholkoncentratiónin í blóðinum í tí umráðandi tíðarbili ella aftan á fer upp um tey mark, sum galda fyri promillukoyring og koyring við kenning, ávikavist 0.80 0/00 og 1.20 0/00.

2) Eftir norsku regluni ber maður sakarábyrgd fyri rúsdrekka aftan á koyringina, tá ið hesin skilir ella átti at skilt, at løgregluransókn kann standast av koyringini.

Nevndin heldur, at sakarábyrgd eigur at verða knýtt saman við objektiv eyðkenni, og skjýtur upp, at sakarábyrgd fyri rúsdrekkanjóting aftan á koyringina verður samanknýtt við tey viðurskifti, at førarin av motordrivnum akfari sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella annars verið fyri ferðsluóhapp, ella løgreglan hevur verið eftir honum.

Við orðingini »sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella annars verið fyri ferðsluóhapp« er at skilja øll ferðsluóhapp, bæði einaóhapp og óhapp, har ið annað akfar ella fólk hevur verið uppi í, og eisini óhapp annars, har ið skaði er gjørdur á ogn ella lut hjá øðrum fólki.

Tá ið ásetingin verður nýtt, heldur nevndin, at tá ið hugsað verður um, hvat ið hent og rímiligt er, eiga tey ferðsluóhapp at vera undantikin, har sum bert lítilsverdur (smávegis) skaði er gjørdur á lutir, tó um skaði verður á ogn ella lutir hjá øðrum fólki, eisini treytað av tí, at tann, sum skaðan hevur volt, beinan vegin vendir sær til tann, sum hevur verið fyri skaða. Um nýtslan av ásetingini verður soleiðis av-

markað, er samsvar millum tey objektivu eyðkenni fyri sakarábyrgd og skylduna at boða løgregluni frá ferðsluóhappi, sbr. viðmerkingarnar til § 1, nr. 8.

Við teimum valdu eyðkennum við teimum nevndu avmarkingum vil nevndin halda, at hon hevur fingið við tey føri, har tørvur er á at gera drekking aftaná revsiverda.

At enda skal verða sagt, at til tess at sakarábyrgd verður, krevst fyriætlan ella ósketni til tess, at tey objektivu eyðkenni eru til.

Tær ásetingar, sum nevndin skjýtur upp, eru soleiðis orðaðar, at rúsdrekkanjóting aftan á koyringina sum sjálvstøðugt lógarbrot verður mett javnt við promillukoyring og koyring við kenning, alt eftir hvussu stór promillan er.

Við at nýta hesa orðing hevur nevndin havt í hyggju gløggliga at gera grein fyri tí, at drekking aftaná sum sjálvstøðugur revsiverdur atburður viðvikjandi revsing og frádøming av førararætti verður mett hellt javnt við promillukoyring og koyring við kenning. Nevndin hevur roknað við sum avgjørt, at treytaðir dómar ikki verða nýttir, og vísir á, at tey samanborið við norsku regluna broyttu eyðkenni fyri, at sakarábyrgd tekur við, júst viðvikja teimum førum, har teir norsku dómstólarnir hava havt lyndi til at meina, at linnandi umstøður eru, og tí hava nýtt treytaða revsing.

Ein tílík javnstøða millum tey tvey sløgini av lógarbrotum er neyðugtvilig, skulu tær ásetingar, sum skotið er uppá, hava ta ætlaðu ávirkan.

Til § 1, nr. 8.

§ 26, 1. stk., í ferðslulógini hevur tær reglur sum galda sum skyldur, tá ferðsluóhapp henda.

Sambært § 26, 1. stk., skal hvør tann sum sekur ella ósekur verður luttakandi í ákoyring ella øðrum ferðsluóhappi, beinanvegin steðga og eftir førimuni veita meiddum hjálp og annars taka lut í teimum tiltøkum, sum óhappið elvir til. Teir avvarðandi eru sínamillum skyldigir at sigu frá navni og bústaði, sum kravt verður, og hava annars skyldu til at geva tær upplýsingar um óhappið, sum teir eru førir fyri. Avvarðandi hevur eisini skyldu til sum skjótast at boða løgregluni frá tilburðinum.

§ 26, 2. stk., skilar til, at skuldu ferðslaskelti, merki, stongslar ella lyktir við vegarbeiði vera avlagað, skal førarin beinan vegin eftir førimuni fáa merkingarnar aftur í lag.

Viðvíkjandi § 26, 1. stk., skal verða sagt, at ógreitt er, í hvønn mun tað er skylda at boða løgregluni frá ferðsluóhappi. Tað eru eingi fyrireikingararbeiði til skjals til ferðslulógina, sum hon varð samtykt av løgtingi í 1963. Men lógarfyrimyndin sýnist yvirhøvur at hava verið danska ferðslulógin frá 1955, sum ikki hevur eina so almenn orðaða reglu um fráboðanarskyldu sum tann føroyska. Eftir donsku ferðslulógini frá 1955 er einans fráboðanarskylda í teimum førum, har skaði er gjørdur á fólk,

djór, akfør ella aðrar lutir, sum hava ikki lítið virði, og har sum eingin er hjá at krevja upplýsingar frá, um navn og bústað hjá tí, sum hevur fört akfarið, ið skaðan hevur volt. Við hesum í huga sýnist greitt, at ætlanin við ordingini av teirri føroysku áseting hevur verið, at fráboðanarskyldan skuldi vera viðgongdari enn í donsku ferðslulógini. Men í royndum hevur ikki verið hildið, at fráboðanarskylda er, tá ið tað í ferðsluóhappi eins er eins egna akfar, ið hevur fingið skaða.

Nevndin heldur, at reglurnar um fráboðanarskylduna eiga at greinast gløggliga, og at tað eigur at vera meginregla, at løgreglan fyri trygdar sakir í ferðsluni beinan vegin eigur at fáa boð um hvørt ferðsluóhapp. Nevndin skjýtur tí upp, at ein áseting sum § 26, 3. stk., verður sett uppi, eftir henni hevur hvør tann, sum sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella annars verið fyri ferðsluóhapp, skyldu til beinan vegin at boða løgregluni frá ferðsluóhappinum. Við ordingini hvør tann, sum »sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella annars verið fyri ferðsluóhapp«, skal sum tikið fram í viðmerkingunum til § 1, nr. 4-6, verða at skilja øll ferðsluóhapp, einaóhapp eins og óhapp, har ið annað akfar ella fólk hevur verið uppi í, og eisini óhapp annars, har ið skaði er gjørdur á annans mans ogn ella lutir.

Frá høvuðsregluni verða, tá ið tað er hent og rimiligt, undantikin ferðsluóhapp, har sum bert lítilsverður (smávegis) skaði er gjørdur á lutir, tó, um skaði verður gjørdur á annans manns ogn ella lutir, eisini treytað av tí, at tann, sum skaðan voldi, við tað sama vendir sær til tann, sum hevur verið fyri skaða.

§ 26, 1. stk. og 2. stk., skjýtur nevndin upp, skulu varðveitast við ávísum broytingum í ordingini.

Serliga um nýtsluna av § 26, 1. stk., skal verða sagt, at løgreglan fyri nevndini hevur upplýst, at í árunum 1978 og 1979 eru skrásettir ávikavist 192 og 188 tilburðir, har ið fólk, sum hava verið uppi í ferðsluóhappi ella ákoyring, sum hevur havt við sær skuða á annans manns ogn ella lutir, eru rýmd frá óhappsstaðnum uttan at taka lut í teimum tiltøkum, sum óhappið elvdi til, og uttan at boða løgregluni frá óhappinum. Við hesum í huga heldur nevndin, at orsøk kann vera til at herða revsingina í hesum førum.

Til § 1, nr. 9-11 og nr. 17.

Í galdandi reglum um steðg og parkering er eingin áseting, sum forbjóðar steðg ella parkering við biðiplass hjá bussi.

Áseting um hetta er neyðug, og nevndin skjýtur upp í galdandi ásetingar um forboð fyri at steðga og parkera at seta forboð fyri at steðga og parkera við biðiplass hjá bussi styttri enn 12 metrar frá hvørjumegin skelti ella á tí avmerkta strekkinum hvørjumegin skeltið.

Viðvíkjandi uppseting av skeltum verður vist til kunngerð nr. 75 frá 17. juni 1980 um vegmerking § 19, E 61,1, og E 61,2. Tað strekkið hvørju megin skeltið, har ikki er loyvt at steðga og parkera, kann gjølliga tilskilast við at nýta ta striku, sum vist er í § 45, T 61, í kunngerðini.

Tann broyting av § 58 b, 1. stk., nr. 2, (§ 1, nr. 17 í uppskotinum) sum er skotin upp, ber við sær, at fyri brot á ásetingina kann gjald verða lagt a í staðin fyri sekt.

Til § 1, nr. 12-15.

Tær galdandi ásetingarnar í ferðslulógini um lyktaljós eru fløkjaligar og røkka ikki til. Nevndin skjýtur tí upp, at ásetingarnar verða endurskoðaðar og orðaðar í samsvari við tær reglur, sum galda í Danmark. Tá ið nevndin, sbr. frammanfyri viðmerkingarnar til § 1, nr. 3, skjýtur upp, at tær donsku reglur fyri útgerð verða havdar sum undirstøða, tá ið nýggj føroysk kunngerð um útgerð verður gjørd, og av tí at tann kunngerð um útgerð m.a. er givin sambært ásetinguuum um lyktaljós, eiga reglurnar um lyktaljós at samsvara við tær donsku reglurnar.

Sum støðan er í dag, má nógv av arbeiðinum fara fram á yvirtíð og summar ynskiligar kanningar verða ikki gjørdar. Av ti at bert ein histolaborantur er, er somuleiðis trupult at fáa gjørt arbeiði í ferju og vegna sjúku. Um so er, at arbeiðsbyrðan veksur, er neyðugt aftur at senda royndir til Danmarkar til kanningar.

ad r.

Søkt hevur verið eftir tóli síðani 1979/80. Hetta er ein liður í at nýtimansgera eygnadeildina og harvið lætta um arbeiðið og fáa fleiri sjúklingar kannaðar.

ad h.

Neyðugt hevur verið at minka um ambulanta viðgerð, av ti at so nógvir innlagdir sjúklingar hava tørv fyri fysioterapi.

ad j.

Pr. 1. desember 1981 verður yvirlækni í fysiurgi og rehabilitering settur og økir hetta um skrivingina. Hetta kann ikki nøktast við verandi skrivarrúm

ad k.

Grundgevingin er, at nógv skriviarbeiði er á rannsóknarstovuni, serstakliga viðvíkjandi ambulantum sjúklingum. Arbeiðið verður í dag gjørt av laborantum og minkar hetta um arbeiðsorkuna hjá rannsóknarstovuni.

ad l og m.

Sjúkrasystraútbúgvingin var broytt pr. 1. oktober 1979. Eftir hetta verða sjúkrasystranæmingar ikki roknaðir upp í normeringina, t.v.s. at tær nú ikki eru arbeiðsmegi á deildunum. Harafturat koma fleiri røktarkrevjandi sjúklingar.

ad n.

Talið á psykiatriskum røktarsjúklingum er økt.

ad o.

Gjøgnum árini hava fleiri tól verið keypt til sjúkrahúsini í Føroyum. Hesi nýggju tól eru fyri tað mesta elektronisk. Nevnast kann til dømis tól á røntgendeildini og intensivari deild. Vit hava í Føroyum ta serstøðu, at ein teknikkari er viðkomandi av m.a. røntgenvirkinum til at umvæla og umsita hesi tól. Aðrastaðni koma teknikkarar frá virkinum fyri at gera hetta. Hetta sparir ferðaútreiðslur fleiri ferðir um árið til teknikkarar. Av tí at nógv fleiri tól eru komin til hesi seinastu árini, og av tí at bert ein teknikkari ansar eftir tólunum, bæði á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi, og at viðkomandi somuleiðis hevur eftirlit við dialysutólunum í Tórshavn, er neyðugt at normera eitt starv sum teknikkari afturat.

ad p.

Søkt hevur verið eftir einum arbeiðsmanni í átta ár. Í hesum tíðarskeiði eru fleiri deildir tiknar í nýtslu og hevur hetta økt um arbeiðið.

ad r.

Ein konsulentur í barnasjúkum hevur arbeitt á Landssjúkrahúsinum síðani 1. september 1979. Hetta hevur havt stóran týdning fyri viðgerðina av børnum, m.a. við at stytta um innleggingartíðina. Sambært áliti frá ráðleggingarnevndini er tørvur á einum serlækna í barnasjúkum.

ad s.

Aftaná at tann nýggja sjúkrasystraútbúgvingin er komin í gongd, hevur tað vist seg, at ov lítið av lærarum eru á skúlanum, orsakað av at teoretiska útbúgvingin er víðkað munandi.

ad t.

Í 1980/81 vóru útgoldnar 868.862,25 kr. í viðbótum, har íroknað yvirtíð til sjúkrahúsarbeiðararnar. Við at víðka talið við 2 kann útgjaldan av yvirtíð minkast. Roknast kann við, at meirútreiðslurnar verða minni enn sett upp.

ad u.

Køkinum tørvar eina uppvaskimaskinu til stór íløt, so sum kjøtbakkar, baljur, spannir og annað, sum er ov stórt at vaska í ti uppvaskimaskinu, ið er framman-undan.

— — — — —

Viðmerkingar frá landsstýrinum.

Landsstýrið kann bert taka undir við játtan til ynskir um nýnormeringar og nýkeyp uppá 1,7 milj. kr. tilsamans, herav verður landskassans partur 850.000,- kr.

Landsstýrið heitti ti á stýrið fyri Landssjúkrahúsið um at gera eina nýggja prioritetsraðfylgju innan omanfyrinevndu rammu.

Sbrt. skriv dagfest 4. desember 1981 frá Sjúkrahússtjóranum.

Visandi til fundin tann 4. desember 1981 viðvíkjandi uppskot til fíggjarætlan hjá Landssjúkrahúsinum fyri 1982/83 verða ynskini sett í hesi prioritetsraðfylgju:

Tól til ultraljóðscanning	150.000 kr. (1. part av 2)
Narkosuyvirlækni	317.000 kr.
Teknikkari	110.000 kr.
Konsulentur í barnasjúkum	100.000 kr.
1/2 sjúkrasystralærari	70.000 kr.
5,5 sjúkrasystrar	682.500 kr.
Histolaborantur	111.000 kr.
Umnormering av 1. hjálparlæknastarv til yvirlæknastarv á røntgendeildini	0 kr.
1/2 hjálparfólk til røntgendeildina	46.000 kr.
Grýtuuppvaskimaskina	60.000 kr.
Ómflutningsgjald	48.500 kr.
Tilsamans	1.700.000 kr.

Uppskotið javnvigar við 121.297.500 kr., og **landskassastudningurin verður 50.830.587, 50 kr.**

— — — — —

Skjølini eru til skjals á Landsskrivstovuni.

Ad § 12/2020 Klaksvíkar Sjúkrahús.

Sbrt. skriv dagf. 3. november 1981 frá Sjúkrahússtjóranum:

Visandi til skriv landsstýrisins dagfest 21. september 1981, j. nr. 400-31, verður sagt frá, at stýrið fyri Klaksvíkar sjúkrahús á einum fundi tann 22. oktober 1981 hevur viðgjørt hjálagda uppskot til fíggjarætlan fyri 1982/83.

Uppskotið javnvigar við 26.127.000,- kr. ímóti 20.919.300,- kr. 1981/82 og 19.559.988,77 kr. í 1980/81, ella hækkingar uppá ávikavist 24,9% og 33,6%.

Landskassastudningurin verður eftir uppskotinum 12.880.250,- kr. móti 10.327.150,- kr. í 1981/82 og 9.619.547,42 kr. í 1980/81, ella hækkingar uppá ávikavisk 24,7% og 33,9%.

1. partur, framhald av verandi rakstri, javnvigar við 24.700.000,- kr., og eru hetta hækkingar í mun til 1981/82 og 1980/81 uppá 18,1% og 26,3%. Landskassastudningurin verður 12.181.750,- kr., ella hækkingar uppá 18,0% og 26,6%.

Tann stóra hækkingin í verandi rakstri er orsakað av, at Klaksvíkar sjúkrahús í uppskotinum fyri fyrstu ferð hevur lagt upp fyri væntaðar lønar- og prishækkingar í 1982/83, sambært hjálagda yvirlit. Grundarlagið fyri uppskotið er lønir og prisir pr. 1. juli 1981 og hækkingarnar, ið vóru í tíðarskeiðinum 1. juli 1980 - 1. juli 1981.

Umframt verandi rakstur eru eftirfylgjandi ynskir:

1 citografur	150.000,- kr.
Stuttbylgjutól til fysiurgisku deild	32.000,- kr.
Blóðteljingartól til rannsóknarstovuna	36.000,- kr.
2 skáp til dagbókasavn	35.000,- kr.
Analgesitól til føðistovuna	20.000,- kr.
Kuvøsa	45.000,- kr.
10 sengur	80.000,- kr.
Hillaskipan til deild A og skurðdeildina	64.000,- kr.
1 sjúkrasystir til deild A	150.000,- kr.
1/2 sjúkrasystir til deild B	75.000,- kr.
2 sjúkrasystrar til skurðdeildina	350.000,- kr.
1/2 laborantur	80.000,- kr.
Skrivari til fyristøðukvinnuna	120.000,- kr.
Sjúkrahúsarbeiðari	190.000,- kr.
Tilsamans	1.427.000,- kr.

Stýrið viðtók at mæla til, at játtað varð framhald av verandi rakstri uppá 24.700.000,- kr. og eftirfylgjandi ynskir:

a. Citografur	75.000,- kr.
b. Stuttbylgjutól til fysiurgisku deild	32.000,- kr.
c. 2 skáp til dagbókasavn	35.000,- kr.
d. 4 sengur	32.000,- kr.
e. Hillaskipan til deild A og skurðdeildina	30.000,- kr.
f. 1/2 sjúkrasystir til deild A	75.000,- kr.
g. Sjúkrasystir til skurðdeildina	175.000, kr.
h. 3/4 skrivara til fyristøðukvinnuna	90.000,- kr.
j. Sjúkrahúsarbeiðara	100.000,- kr.
Tilsamans	644.000,- kr.

Ad a.

Hvør sjúklingur fær eftir hesi skipan eitt kort, ið skal nýtast á øllum deildum á sjúkrahúsinum. Hetta lættir nógv um arbeiðið og ger møguleikar fyri skeivleikum væl minni. Upphæddin er sett niður, av at gjørligt er at fáa eitt ódýrari tól.

Ad b.

Hetta snýr seg um útskiftan av einum útslitnum tóli.

Ad c.

Í løtuni liggja dagbøkurnar í kassum og er hetta sera óhóskandi í tí dagliga arbeiðinum.

Ad d.

Hetta er eitt lið í at skifta sengurnar út.

Ad e.

Hetta fer at lætta munandi um arbeiðið á deildunum. Eftir ætlanini verður tað keypt yvir 2 ár.

Ad f.

Søkt hevur verið fyrr eftir eini hálvari sjúkrasystir. Grundgevingin er ein støðugur yvirbeleggningur og fleiri røktarsjúklingar.

Ad g.

Í løtuni hevur ein skurðsjúkrasystir vakt. Tá ið skurðviðgerðir fara fram uttan fyri vanliga arbeiðstíð er sostatt bert ein sjúkrasystir til at vera læknanum til hjálpar og er hetta ov lítið.

Ad h.

Fyristøðukvinnan hevur higartil nýtt læknaskrivararnar. Orsakað av at Klaksvíkar sjúkrahús síðani juni 1979 hevur sent sjúklingar niður er skrivara-arbeiðið økt. Samstundis kemur medisinski yvirlæknin pr. 1. november 1981. Tað hálva starvið skal eftir ætlanini nýtast sum skrivarahjálp, meðan fjórðingurin skal nýtast í samband við citografin.

Ad j.

Í løtuni eru 3 størv sum sjúkrahúsarbeiðarar. Harafturat koma partvís starvsfólkini umborð á Medicus. Sjúkrabilkoyringin er økt munandi, eisini uttan fyri vanliga arbeiðstíð, og førir hetta útgjaldan av yvirtíð við sær. Harafturat kemur, at vaktarskipan má verða alt samdøgrið.

Fleiri av størvinum, ið søkt vóru eftir, hevur stýrið ikki játtað.

Hetta stendst av, at sáttmálarnir hjá yngri læknum, sjúkrasystrum og laboruntum eru broyttir munandi, og førir hetta við sær, at fleiri størv mugu normerast pr. 1. januar 1982. Ein serstøk umsókn hesum viðvikjandi verður send landsstýrinum, tá ið tørvurin er útroknaður.

Uppskotið javnvigar eftir hesum við eini upphædd uppá 25.344.000,- kr., ið er ein hækking uppá 21,2% í mun til ætlanina fyri 1981/82 og 29,6% í mun til roknskapin fyri 1980/81. Landskassastudningurin verður 12.503.750,- kr., ella hækkingar uppá ávikavist 21,1% og 30,0%.

Ynskini uppá 644.000,- kr. svara til 2,6% av verandi rakstri.

Vísandi til § 6, 2. pætti í reglugerð fyri Sjúkrahúsverk Føroya, skal eg mæla til, at játtaður verður ein landskassastudningur uppá 12.503.750,- kr.

— — — — —

Sambært skriv dagfest 16. oktober 1981 frá Klaksvíkar sjúkrahúsi:

Hjálagt verður sent uppskot til fíggjarætlan fyri árið 1982/83. Javnvágin er **kr. 24.700.000,00.** Í mun til uppskotið fyri 1981/82 er hetta ein meirnýtsla uppá **kr. 3.780.700,00,** ella 18,07%.

Parturin hjá Ríkis- og Landskassanum er **kr. 12.181.750,00.**

Roknað verður við 18.000 sjúkradøgum. Útreiðslan pr. sjúkradag verður **kr. 1.372,22.** Í fíggjarárinum 1980/81 var hon kr. 1.095,92, í ár er hon mett til kr. 1.162,11.

Konto 10 lønir. Lønirnar eru mettar til **kr. 18.525.000,00,** tað er 75% av teimum samlaðu útreiðslunum. Tað skal viðmerkjast, at til yvirlæknarnar, konto 10.01.1, er avsett ein ársløn eyka, so teir kunnu halda frí í 3 mánaðir av árinum við løn afturat ti vanligu fritiðini.

Konto 30 medicin v.m. Konto 30.01.1 er hækkað upp til kr. 400.000,00. Í 1980/81 brúktu vit kr. 304.153,55 til medicin.

Kostarhald (konto 36) er hækkað við kr. 100.000,00.

Til ljós og hita meta vit okkum at nýta kr. 178.000,00 meira enn í ár.

Konto 50 umsiting av húsum. Konto 50.03.1 er hækkað við kr. 70.000,00. Ætlanin er at halda áfram við at seta nýggj vindeygu í á sjúkrahúsinum. Yvirlæknahúsini krevja eisini til ábøtur. **Konto 50.10.1 hjálparlæknahús.** Til liðugtgeran av økinum um húsini verður avsett **kr. 250.000,00.**

Læknabátur (konto 60). Konto 60.02.1 olja er hækkað við **kr. 24.000,00.** Konto 60.04.1 aðrar útreiðslur kr. 10.000,00 til nýggj bjargingarbeltir, sum skipasýnið hevur kravt.

Konto 62 sjúklingaflutningur. Á konto 62.02.1 ferðaútreiðslur uttanlands eru í tíðarskeiðinum 1/4 til 30/9 í ár brúktar kr. 200.656,90. Vit hava bert **kr. 160.000,00.** Fyri 1982/83 verður avsett **kr. 400.000,00.**

Eftirúthúgving v.m. (konto 70) verður hækkað við **kr. 30.000,00.**

Konto 72 tryggingar. Nakrat tryggingar eru hækkaðar, kontoin er hækkað við **kr. 28.000,00.**

Sjúkrasystraskúlin (konto 80). Okkara partur verður **kr. 170.000,00.** Nýkeypini fyri 1982/83 standa á blaðsiðu 10. Nøkur tilboð eru viðløgd.

Ynski okkara um fleiri starvsfólk eru á blaðsiðu 11. Fylgiskjøl frá fyristøðukvinnuni um, hvi vit ynskja okkum tey, eru viðløgd.

Ein hálvur laborantur stendur eisini á blaðsiðu 10. Yvirtíðin er so stór, at vit høvdu spart, um vit fingu hann. Tað verður eisini meira at gera á laboratoriinum, nú vit fáa medicinskan yvirlækna.

INNTØKUR:	**roknskapur 1980/81**	**fíggjarætlan 1981/82**	**fíggjarætlan 1982/83**
konto 01 uppihaldsgjald	195.380,00	185.000,00	193.000,00
konto 04 flutningur	36.000,00	15.000,00	15.000,00
konto 05 húsaleiga v.m.	89.513,93	65.000,00	128.500,00
konto 06 ríkisstudningur	9.619.547,42	10.327.150,00	12.181.750,00
konto 07 landskassi	9.619.547,42	10.327.150,00	12.181.750,00
	19.559.988,77	20.919.300,00	24.700.000,00
ÚTREIÐSLUR:			
konto 10 til 23 lønir	13.291.256,74	15.315.000,00	18.525.000,00
konto 30 medicin	1.016.686,26	968.300,00	1.251.000,00
konto 33 røntgen	127.649,65	170.000,00	195.000,00
konto 36 kostarhald	567.405,13	646.000,00	734.000,00
konto 40 hiti og ljós	527.836,82	540.000,00	718.000,00
konto 41 vaskarlið og seymist.	19.393,85	24.000,00	25.000,00
konto 42 reingerð v.m.	55.432,74	75.000,00	85.000,00
konto 50 umsiting av húsum	1.934.706,02	1.393.000,00	952.000,00
konto 51 innflutningsgjald	284.577,06	300.000,00	320.000,00
konto 53 sjúkrahússtjórafyrisæti	93.566,23	88.000,00	109.000,00
konto 54 fyrisitingin	358.780,39	230.000,00	257.000,00
konto 55 grannskoðan	12.000,00	10.000,00	12.000,00
konto 56 vøruvognurin	5.145,00	19.000,00	20.000,00
konto 60 læknabáturin	142.200,84	111.000,00	156.000,00
konto 61 sjúkrabilurin	41.813,05	50.000,00	54.000,00
konto 62 sjúklingaflutningur	472.658,30	412.000,00	702.000,00
konto 63 koyring og reinhald	32.037,60	39.000,00	44.000,00

konto 65 aðrar útreiðslur	4.981,40	17.000,00	17.000,00
konto 70 eftirútbúgving og tænastuf.	177.837,27	140.000,00	170.000,00
konto 72 trygging og gjøld	107.813,00	133.000,00	161.000,00
konto 73 socialar veit. til sjúkl.	12.095,00	9.000,00	13.000,00
konto 74 sjúkl. ítriv, bókasavn v.m.	7.352,16	10.000,00	10.000,00
konto 80 sjúkrasystraskúlin	141.217,98	120.000,00	170.000,00
konto 85 nýkeyp	125.546,28	100.000,00	—
	19.559.988,77	20.919.300,00	24.700.000,00

Viðmerkingar frá landsstýrinum.

Landsstýrið kann bert taka undir við játtan til ynskir um nýnormeringar og nýkeyp upp á 450.000,- kr.

Landsstýrið heitti ti á stýrið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús um at gera eina nýggja prioriteringsraðfylgju innan omanfyrinevndu rammu.

— — — — —

Sbrt. skriv dagfest 4. dec. 1981 frá Sjúkrahússjóranum:

Vísandi til fundin tann 4. desember 1981 viðvíkjandi uppskot til figgjarætlan hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri 1982/83 verða ynskini sett í hesi prioritetsraðfylgju:

Citografur	42.000 kr.
Skrivari til fyristøðukvinnurnar	120.000 kr.
Sluttbylgjutól til fysiurgisku deild	32.000 kr.
2 skáp til dagbókasavn	35.000 kr.
1/2 sjúkrasystir til deild A	75.000 kr.
Sjúkrasystir til skurðdeildina	146.000 kr.
Tilsamans	450.000 kr.

Uppskotið javnvigar við 25.150.000 kr., og landskassastuðningurin verður **12.406.750 kr.**

Ad § 12/2030 Suðuroyar Sjúkrahús

Sbrt. skriv dagf. 3. november 1981 frá sjúkrahússtjóranum:

Vísandi til skriv landsstýrisins dagfest 21. september 1981, j. nr. 400-31, verður sagt frá, at stýrið fyri Suðuroyar sjúkrahús tann 23. oktober 1981 hevur viðgjørt hjálagda uppskot til figgjarætlan fyri 1982/83.

Samlaða uppskotið javnvigar við eini upphædd uppá 12.185.950,- kr., ímóti 10.382.000,- kr. í 1981/82 og 10.251.475,15 kr. í 1980/81, ella hækkingar uppá ávikavist 17.4% og 18,9%. Landskassastudningurin verður eftir uppskotinum 6.057.495,- kr. ímóti 5.160.000,- kr. í 1981/82 og 5.078.514,59 kr. í 1980/81, ella hækkingar uppá ávikavist 17,4% og 19,9%.

1. partur, framhald av verandi rakstri, javnvigar við 11.942.950,- kr., har iroknað 200.000,- kr. í gjaldi til ellis- og røktarheimsgrunnin. Hetta eru hækkingar uppá ávikavist 15% og 16,5%. Landskassastudningurin verður 5.935.975, kr. ella hækkingar uppá 15,0 og 16,9%. Orsøkin til tær stóru hækkingarnar er, at tað fyri fyrstu ferð er roknað við lønar- og prishækkingum í uppskotinum, sambært hjálagda yvirlit yvir lønar- og prishækkingar í tíðarskeiðinum 1. juli 1980 - 1. juli 1981.

Grundarlagið fyri uppskotið er lønir og prísir pr. 1. juli 1981 og omanfyri nevndu hækkingar.

Í uppskotinum er sett upp eftirfylgjandi ynskir:

Fysioterapeutur	156.000,- kr.
Fimleikalega til fysiurgisku deild	10.000,- kr.
Medicinskáp til seingjadeildina	8.000,- kr.
Infusiónspumpa til seingjadeildina	20.000,- kr.
4 pleygusengur	22.000,- kr.
Læknaról	25.000,- kr.
Upprnormering av einum skrivstovumanni, ið hevur lønir undir sær, til yvirassistent	2.000 - kr.
Tilsamans	243.000,- kr.

Stýrið viðtók at mæla til, at játtað varð framhald av verandi rakstri og eftirfylgjandi ynskir:

a. 1/2 fysioterapeutur	78.000,- kr.
b. Fimleikalega	10.000,- kr.
c. Infusiónspumpa	20.000,- kr.
d. 4. pleygusengur	22.000,- kr.
e. Umnormering til yvirassistent	2.000,- kr.
Tilsamans	132.000,- kr.

Ad s. Í løtuni er normerað 1 1/2 starv sum fysioterapeutur. Vitjetligt er ikki at nokta tørvin fyri fysioterapi, serliga hjá ambulantum sjúklingum. Virksemið á deildini er ikki nógv minni enn á Klaksvíkar sjúkrahúsi, ið hevur 3 starv.

Ad b og c. Hesi tól lætta um arbeiðið.

Ad d. Á sjúkrahúsinum er støðugt roktarsjúklingur, og tí eru sengurnar ætlaðar teimum.

Ad e. Ein av skrivstovumonnunum hevur allar løtuvitjanirnar sær undir sær, og setur hetta stór krøv til viðkomandi.

Uppskotið javnvigar hareftir við eini upphædd uppá 12.074.950,- kr. Tilsvarandi hækkingar í mun til ætlanina fyri 1981/82 uppá 16,0% og uppá 17,8% í mun til roknskapin fyri 1980/81. Landskassastudningurin verður 6.001.975,- kr., ella hækkingar uppá 16,5% og 18,2%.

Ynskini uppá 132.000,- kr. svara til 1,1% av framhaldi av verandi raksturi.

Vísandi til § 6, 2. petti í reglugerðini fyri Sjúkrahúsverk Føroya skal eg viðmæla, at landskassastudningurin fyri 1982/83 verður 6.001.975,- kr.

— — — — — —

Sbrt. skriv dagf. 7. okt. 1981 frá Suðuroyar sjukrahúsi:

Tað verður við hesum sent uppskot til fíggjarætlan fyri árið 1982-83, ið vísir eina javnvág uppá kr. 11.742.950,00, her er partarin hjá Suðuroyar Fólkir & Rok. í hesi frádrigin.

Tá Konto 05, Húsalcigu v.m. er fradragin, er eftir at dekka líka væl millum tað og Landskassan kr. 11.671.950,00 t.v.s. at 5.835.975,00 til hvønn partin.

Hetta er ein hækkan millum roknskapin fyri árið 1980-81 og viðlagdu fíggjarætlan uppá kr. 1.491.494,85 og millum fíggjarætlan fyri árið 1981-82 og viðlagan uppá kr. 1.761.700,00, og verður hetta í prosentum ávikavist 14% og 17,5%.

Vit hava roknað við 7000 sjúkadøgum, t.v.s. at hvør sjúkadagur kemur eftir hesum at kosta kr. 1.667.00, sum eftir okkara meining er óvanliga dýrir.

Konto 10-18. Lønir:

Henda konto hækkar við kr. 1.672.850,00 í mun til fíggjarætlanina fyri árið 1981/82, og er hetta tað mesta av allari hækkingini fyri alla fíggjarætlanina, og er nakað av grundini tann, at í hesari fíggjarætlanini, er tær tvær dyrtíðarviðbøturnar, ið útgoldnar vóru í oktober mánað 1980, tær vóru ikki inroknaðar fíggjarætlantini fyri árið 1981/82. Líkaleiðis bleiv tilkallivaktir, forskotin tíð við meira eftirreguleraði frá 1. oktober 1977 til 1. oktober 1980.

Samstundis eru bæði tær donsku og føroysku lønirnar hækkaðar munandi, tað seinasta árið.

Vit hava roknað við lønum galdandi frá 1. juli 1981 við einari hækkan uppa millum 6 og 12%.

Konto 23. Eftirlønargjald.
Henda konto er hækkað við kr. 162.500,00, og kemur hetta fyri tað mesta av, at okkara yvirsjúkrasystur fer frá við eftirløn, sum sett er á hesa konto, og restin í hækkan av eftirlønargjaldinum fyri starvsfólkið.

Fyrisitingin meinar ikki at tað eru grundir fyri viðmerkingar til hinar postarnar á fíggjarætlanini.

Uppskot til Fíggjarætlan fyri f/Á. 1982/83.
Suðuroyar sjókrahús.

	Rokniskapur 1980/81.	Fíggjarætlan 1981/82.	Fíggjarætlan 1982/83.
Inntøkur.			
Konto 05. Húsaleiga v.m.	94.445,98	62.000,00	71.000,00
Konto 06. Ríkisstudningur.	5.078.514,58	4.959.625,00	5.835.975,00
Konto 06. Landskassastudningur	5.078.514,59	4.959.625,00	5.835.975,00
Konto 07.20. Millumrokning S.E.R.	0,00	1.820.750,00	0,00
Inntøkur tilsamans	10.251.475,15	11.802.000,00	11.742.950,00
Útreiðslur:			
Konto 10-18. Lønir	6.608.456,26	7.615.000,00	8.175.850,00
Konto 23. Eftirlønargjald.	365.471,92	413.000,00	568.500,00
Konto 30. Medicin v.m.	441.461,50	595.000,00	611.000,00
Konto 33. Røntgendeildin.	85.161,54	150.000,00	170.000,00
Konto 36. Kostarhald.	180.930,25	541.000,00	253.700,00
Konto 40. Ljós & hiti	245.635,49	505.000,00	363.300,00
Konto 41. Vaskari/seymistova	27.477,06	82.000,00	45.300,00
Konto 42. Tilfar til reingerð	29.411,24	44.000,00	45.000,00
Konto 50. Umsitan av húsum v.m.	1.402.682,53	726.000,00	413.000,00
Konto 51. Innflutningsgjald	162.819,24	280.000,00	210.000,00

Konto 52. Sjúkrahússtjórin v.m.	48.912,00	60.000,00	65.000,00
Konto 54. Fyrisitingin	140.249,91	254.000,00	263.000,00
Konto 55. Grannskoðan	14.000,00	15.000,00	18.000,00
Konto 56. Vørnvogturin	9.851,97	25.000,00	15.000,00
Konto 61. Sjúkrabilurin	24.591,90	34.000,00	39.000,00
Konto 62. Sjúklingaflutningur	136.782,10	152.000,00	177.000,00
Konto 63. Koyring/reinhald	29.480,80	41.000,00	48.000,00
Konto 65. Aðrar útreiðslur	3.880,45	15.000,00	19.000,00
Konto 70. Eftirútbúgving v.m.	125.820,67	90.000,00	165.000,00
Konto 72. Tryggingar v.m.	81.206,00	74.000,00	90.000,00
Konto 73. Sosialar veitingar	3.698,80	6.000,00	5.300,00
Konto 74. Læknabøkur/tíðarrit	5.395,70	5.000,00	6.000,00
Konto 80. Sjúkrasystraskúlin	78.097,82	80.000,00	95.000,00
	10.251.475,15	11.802.000,00	11.742.950,00

Sbrt. skriv dagfest 4. december 1981 frá Sjúkrahússtjóranum.

Visandi til fundin tann 4. desember 1981 viðvikjandi uppskot til fíggjarætlan hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri 1982/83 verða ynskini sett í hesi prioritetsraðfylgju:

1/2 fysioterapeutur	78.000 kr.
Fimleikalega	10.000 kr.
2 pleygusengur	11.000 kr.
Tilsamans	99.000 kr.

Uppskotið javnvigar við 12.041.950 kr. og **landskassastudningurin verður 5.985.475 kr.**

Ad § 12-2040: Heilsumiðstøðir í grunn.

Grunnurin til byggjan av heilsumiðstøðini.

Játtað til grunnin:

1978/79	kr. 1.000.000,00
1979/80	kr. 2.200.000,00
1980/81	kr. 1.000.000,00
1981/82	kr. 1.000.000,00
	kr. 5.200.000,00

Goldin studningur	kr. 2.020.160,00	
Goldin lán	kr. 1.479.829,80	kr. 3.499.989,80
		kr. 1.700.010,20
+ inngoldið í grunnin rentur + avdráttur		kr. 6.438,80
At ráða yvir		kr. 1.706.449,00

At rinda innan 1/4-1983:

Læknamiðstøð í Miðvági: lán		kr. 1.188.000,00
studningur		kr. 1.485.000,00
Læknamiðstøð í Runavík:		
Søkt verður um 50% + 40% av kr. 3.464.000, væntandi verður umleið helvtin av hesum goldið í 1982/83, t.v.s.		kr. 1.558.800,00
Læknaviðtalubølir í Sandavági og Sørvági: studningur		kr. 160.000,00
lán		kr. 128.000,00
Læknaviðtalubølir í J. Broncksgøtu: studningur		kr. 402.928,80
lán		kr. 503.661,00
Læknamiðstøð í Vági: studning og lán innbúgv, tilsamans uml.		kr. 100.000,00
Tilsamans at gjalda		kr. 5.526.389,80
Tøkur peningur		kr. 1.706.449,00
		kr. 3.819.940,80
Einasta útreiðsla ið møguliga kann útsetast til 1983/84 er heilsumiðstøðin í Runavík:		kr. 1.558.800,00
	At játta	kr. 2.261.140,80

Í 1982/83 skjýtur landsstýrið upp at seta 1 milj. kr. í grunnin fyri Heilsumiðstøðir.

Ad § 12-2050: Læknar.
Smbrt. skriv dagfest 19. oktober 1981:

Under henvisning til landsstyrets skrivelser af 7. og 21. september 1981 (j.nr. 400-31[33]) vedrørende forslag til lagtingslov for finansåret 1982/83 skal man herved meddele, at landskassens udgifter for såvidt angår konto **§ 12-2050**, læger, kan anslås som nedenfor angivet.

Til sammenligning er opført regnskabstal for finansåret 1980/81 og bevillingstal for finansåret 1981/82.

R.	B.	F.
338.465,40 kr.	395.000 kr.	445.000 kr.

Forslaget fremkommer iøvrigt på følgende måde:

Lønninger m.m.		1.727.000 kr
Refusion fra statskassen	863.000 kr.	
Refusion fra kommunerne	419.000 kr.	1.282.000 kr.
Landskassens nettoudgifter		445.000 kr.

Ved lagtingsbeslutning af 6. februar 1976 tiltrådte lagtinget en forhøjelse af antallet af kommunelægestillinger fra 16 til 23. For nærværende er ialt ansat 21 kommunelæger. De resterende 2 stillinger påregnes besat i løbet af 1982. Udgiftsskønnet på 1.727.000 kr. er udarbejdet på basis heraf. Der er herudover afsat et mindre beløb til flytteudgifter og vikarudgifter.

Ad § 12-2060: Ljósmøður.
Smbrt. skriv dagfest 19. oktober 1981:

Under henvisning til landsstyrets skrivelser af 7. og 21. september 1981 (j.nr. 400-31[34]) vedrørende forslag til lagtingsfinanslov for finansåret 1982/83 skal man herved meddele, at landskassens andel for så vidt angår konto **§ 12-2060, jordemødre**, kan anslås som nedenfor angivet.

Til sammenligning er anført regnskabstal for finansåret 1980/81 og bevillingstal for finansåret 1981/82.

R.	B.	F.
436.777,40 kr.	385.000,- kr.	488.000,- kr.

Forslaget fremkommer således:

Lønninger, transportudgifter m.m.		1.890.000,- kr.
Refusion fra statskassen	945.000,- kr.	
Refusion fra kommuner	457.000, kr.	1.402.000,- kr.
Landskassens nettoudgifter		488.000,- kr.

I udgiftsskønnet indgår samtlige lønninger og honorarer i hendhold til aftalen af juni 1977 mellem den færøske jordemoderforening og landsstyret, som ændret ved aftale af 26. juni 1979 mellem samme parter, samt et mindre beløb til rejseudgifter.

Da tidspunktet for ikrafttræden af den nye jordemoderordning endnu må anses for usikkert, er eventuelle merudgifter i forbindelse hermed ikke taget i betragtning.

Ad § 12-2065: Heimasjúkrasystraskipan.
Smbrt. skriv dagfest 13. november 1981:

Under henvisning til tidligere telefonsamtaler, senest den 10. november 1981, vedrørende finanslagtingslov for året 1982/83, § 12-2065, skal man herved meddele, at de samlede årlige totaludgifter ved den kombinerede sundhedsplejerske-, skolesundheds/skolesygeplejerske- og hjemmesygeplejerskeordning på Færøerne med de pr. 1. juli 1981 gældende priser og lønninger skønnes at ville andrage kr. 4.185.000.

Det er herved forudsat, at den kombinerede ordning er fuldt udbygget hele året som forudsat i den i 1973 afgivne »Betænkning vedr. kommunelægeordning m.m. på Færøerne«. Der er således regnet med løn til 1 leder af ordningen, 6 5/6 sundhedsplejersker, 4 1/3 skolesundheds/skolesygeplejersker og 15 1/3 hjemmesygeplejersker, ialt 27,5 fuldtidsansatte. Herudover er der regnet med udgifter til kørsel, telefon- og uniformsgodtgørelse m.v.

Det bemærkes, at skønnet er behæftet med nogen usikkerhed, bl.a. fordi der endnu ikke er indgået overenskomster med Dansk Sygeplejeråd vedrørende ansættelse ved den kombinerede ordning, og fordi lønudgifterne bl.a. vil være afhængige af anciennniteten hos de sundheds- og sygeplejersker, der ansættes ved ordningen.

Efter reglerne i § 5, stk. 2, i anordning nr. 14 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om hjemmesygeplejerskeordninger, § 5, stk. 2, i anordning nr. 15 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om sundhedsplejerskeordninger og § 7, stk. 2, i anordning nr. 16 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning, refunderer staten til landskassen efter regler

fastsat af indenrigsministeren 50% af udgifterne ved den kombinerede ordning, bortset fra administrationsudgifter. Statens andel af udgifterne må herefter skønnes at ville andrage kr. 2.092.500.

Hvor stor en del af de resterende skønnede udgifter, kr. 2.092.500, som landskassen endeligt vil skulle afholde over finanslagtingslov for året 1982/83 § 12-2065 ser man sig ikke i stand til at udtale sig om, idet der endnu ikke af hjemmestyret er fastsat fordelingsregler for så vidt angår de udgifter, som skal afholdes af hjemmestyret, jfr. A 14/1981 § 5, stk. 2, 2. punktum, A 15/1981 § 5, stk. 2, 2. punktum, og A 16/1981 § 7, stk. 2, 2. punktum.

I denne forbindelse skal man erindre om, at man ved skrivelse af 12. marts 1981 herfra, j.nr. 40-62/1981, bl.a. anmodede landsstyret om at meddele, hvorledes de udgifter, som ikke dækkes af det statslige tilskud, skal fordeles mellem landskassen og kommunerne, og efter hvilke kriterier kommunernes andel skal fordeles på de enkelte kommuner. Man skal samtidig henlede opmærksomheden på, at regler om fordelingen af hjemmestyrets andel af udgifterne til henholdsvis kommunelæger og jordemødre er fastsat i henholdsvis lagtingslov nr. 56 af 17. december 1952 og lagtingslov nr. 25 af 7. september 1954.

Ad § 12-2090/3001: Farsóttir.
Smbrt. skriv dagfest 14. oktober 1981:

Under henvisning til landsstyrets skrivelser af 7. og 21. september 1981 (j. nr. 400-31[36]) vedrørende forslag til lagtingsfinanslov for 1982/83 for så vidt angår konto **§ 12.3001, farsóttir,** skal man herved meddele, at landskassens udgift under den nævnte konto skønnes at blive 30.000 kr. i finansåret 1982/83.

Til sammenligning er anført regnskabstal for finansåret 1980/81 og bevillingstal for finansåret 1981/82.

R.	B.	F.
27.125,45 kr.	73.000,- kr.	30.000,- kr.

Beløbet søges sammen med et tilsvarende statstilskud til afholdelse af udgifter i henhold til den færøske epidemilov. Størrelsen af beløbet er anslået under hensyntagen til regnskabstallet for finansåret 1980/81 samt forbruget for første halvdel af indeværende finansår.

Der henvises endvidere til skrivelse herfra af 19. februar 1981 vedrørende forebyggende foranstaltninger til bekæmpelse af menigitis-epidemi.

Ad § 12-3004: Hvíldarheimið »Naina«.

Smbrt. skriv dagfest 28. september 1981.

Hjálagt sendi eg fíggjarætlan fyri hvíldarheimið »Naina« fyri árið 1982/83.

Partur landskassans og kommunanna		kr.944.300,00
Uppihaldsgjald fyri sjúklingar	kr. 150.000,00	
Havnar kommuna	kr. 12.000,00	
Meginfelag sjúkrakassanna	kr. 1.000,00	kr. 163.000,00
Útreiðslur		kr. 781.300,00

Vit nýta høvi at takka fyri studningin, sum okkum er veittur farna ár. Við tað at nýggi bygningurin ikki varð tikin í brúk í ár, halda vit, at sama upphædd sum fyri 1981/82 fer at vera nóg mikið.

Fíggjarætlan fyri hvíldarheimið »Naina«, 1. apríl 1982 - 31. mars 1983.

	1979/80	1980/81	1982/83
Lønir, inkl. pensiónsgjøld	616.946,80	577.796,96	620.000,00
Kostarhald	58.487,34	58.713,33	140.000,00
Hiti	30.027,60	36.125,80	50.000,00
Ljós	11.535,00	17.790,00	15.000,00
Vask og reingerð	5.940,15	4.039,35	12.000,00
Viðlikahald av húsum	3.378,75	108.552,80	15.000,00
Viðlikahald av innbúgvi	16.607,05	42.944,50	25.000,00
Rentur	305,70	16,53	300,00
Skattur og tryggingar	1.275,00	6.768,00	6.500,00
Skrivstovuhald	1.049,40	1.111,75	4.000,00
Telefonútreiðslur	3.347,00	2.738,00	4.000,00
Læknaútreiðslur	16.623,79	16.579,86	40.000,00
Heilivágur	1.453,45	2.337,35	4.500,00
Revisión	2.700,00	4.900,00	5.000,00
Koyring	416,00	1.465,00	1.000,00
Avgjøld til út- og sjónv.	0,00	3.536,50	0,00
Ymist	1.865,00	5.055,00	2.000,00
	672.399,53	890.470,73	944.300,00

Aftrat hesum kemur gjalding av rentum og avdrøgum upp á lán í sambandi við útbyggingina — sí skriv frá Føroya Landsstýri dagfest 20.9.1979 j. nr. 912-4 umleið 170.000,00 kr. um árið.

— — — — —

Viðmerking frá landsstýrinum

Sambært løgtingslóg um studning til víðkan av hvíldarheiminum »Naina« verður úr landskassanum í fíggjarárinum 1978/79 — 1983/84 veittur ein árligur studningur upp á kr. 100.000,- til víðkan av hvíldarheiminum »Naina« úr landskassanum

rakstur	250.000 kr.
umbygging	100.000 kr.
	350.000 kr.

Að § 14-2205: Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið.

Smbrt. skriv frá Landsskúlafyrisitingini.

Í 1000 kr.	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
605 Endurgjald/ríkið	— 78.835	— 86.719	— 98.941	— 98.941
620 Endurgjald/kommunurnar	— 3.600	— 4.000	— 4.500	— 4.500
660 Endurgjald/ymist	— 2.115	— 2.500	— 2.800	— 2.800
680 Ymsar inntøkur				
22.00 Útreiðslur viðvíkjandi undirvísingarverkinum sum heild	300	300	338	338
2210 Fólkaskúlin	85.750	86.550	99.775	99.775
2215 HF-skeiðið í Suðuroy	2.119	1.998	2.437	2.437
2216 HF-skeiðið í Klaksvík og Gøtu	1.711	2.216	3.893	3.893
2220 Føroya Studentaskúli og HF-skeið	9.341	10.884	12.916	12.916

2225	Kostdeild studentaskúlans	1.183	1.287	1.529	1.529
2230	Føroya Sjómannaskúli	2.961	3.245	3.840	3.840
2240	Klaksvíkar Sjómannaskúli	692	1.390	1.355	1.355
2250	Føroya Fólkaháskúli	1.220	1.268	1.318	1.318
2255	Húsarhaldsskúlar	435	448	523	523
2260	Kvøldskúlar	3.141	4.600	5.398	5.398
2285	Skúlin á Trøðni	7.121	7.413	8.449	8.449
		115.974	121.599	141.721	141.721

Í 1000 kr.		Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
3130	Ítrótta- og skúlabyggigrunnur	7.000	10.000	10.500	10.500
3136	Føroya Skúlasavn	70	70	70	70
3141	Landsskúlafyrisitingin at ráða yvir	32	34	34	34
3142	Læraraskúlanæm. í Danmark	2	2	2	2
3143	Frítíðarskeið fyri fólkaskúlalærarar	9	9	10	10
3144	Studningur frá ríkinum til fólkaskúlabygging	6.500	6.500	7.000	7.000
3145	Ferðaútreiðslur/ríkið	85	89	89	89
		13.698	16.735	17.616	17.616
	Føroya Læraraskeið	7.338	6.482	6.500	6.500
	Tekniskir skúlar	9.212	10.133	11.146	11.146
	Handilsskúlin	2.960	3.224	3.500	3.500
	Føroya Maskinskúli	1.707	1.172	1.796	1.796
	Privatir skúlar	4.300	4.730	5.205	5.205
	Samlaðar útreiðslur	155.189	164.344	187.484	187.484
	Partur landskassans	70.674	71.165	81.200	81.200
				+ 41	+ 41

Almennar viðmerkingar.

Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1982/83 fyri undirvísingarverkið, hevur Landsskúlafyrisitingin roynt at taka við tær konti bæði úr løgtingsins fíggjarlóg fyri 1981/82 og tær játtanir undir undirvísingarmálaráðnum, sum lýsa hvat føroyska undirvísingarverkið kostar. Sammett við uppskotið fyri 1981/82 eru færri konti; frá rakstrarstað 2210 er konto 1030 og 2505, skúlaráðgevarar, ikki tiknar við.

Fyri at kunna gera eina sammeting við árini frammanundan, hevur Landsskúlafyrisitingin á sama hátt broytt tølini fyri 1980/81 (R) og fyri 1981/82 (J).

Skúlin á Trøðni er tikin við í uppskotinum, av tí at hann fór inn á undirvísingarmálaráðsins konto tann 1. januar 1980.

Við eru tiknir bæði sovorðnir undirvísingarstovnar, ið hava havt serliga konto á ti donsku fíggjarlógini, og teir, sum hava verið undir einum á eini samsvarandi konto á tí donsku fíggjarlógini. Fyri hesum stovnum viðvíkjandi hevur tað í Danmark nýtta fíggjarár (álmanakkaárið) verið brúkt, av tí at umrøddu stovnar antin eru ríkisstovnar burturav, ella fáa teir yvirhøvur bert studning úr ríkiskassanum.

Fyrisitingin hevur ikki kannað fíggjarætlanina hjá hesum stovnum gjøllari, av tí at hetta er gjørt í undirvísingarmálaráðnum í sambandi við framløguna av uppskoti til fíggjarlóg fyri 1982.

Fyri allar tær konti undir § 14, sum hetta uppskot fevnir um, hevur Landsskúlafyrisitingin roynt at tikið allar útreiðslur fyri viðkomandi umráði við, uttan mun til um tær verða goldnar av landsstýrinum, ríkinum, kommununum ella øðrum. Uppskotið skuldi tí givið eina mynd av, hvat ið alt undirvísingarverkið kostar.

Tær upplýsingar, ið eru tøkar, fyri útreiðslur kommununnar til rakstur av fólkaskúlanum og til kvøldskúlan, verða ikki mettar at vera nóg nágreinaligar til at verða tiknar við í løtuni. Tó verður mett, at kommunurnar gjalda u. 20% av samlaðu rakstrarútreiðslum fólkaskúlans. Kommunu-útreiðslurnar til kvøldskúlan eru 30% av læraralønunum v.m. við frádrátti av innskrivingargjaldi næminganna. Mett verður, at útreiðslurnar til hesi bæði mál, ið ikki eru tiknar við, eru uml. 20. mill. kr.

Byggiútreiðslurnar eru tiknar við í tann mun, tað snýr seg um útreiðslur, ið verða goldnar av landskassanum ella ríkiskassanum.

Sum byggiútreiðslur verða roknaðar bæði beinleiðis útreiðslur og avseting til serliga grunnar, sum studningur til eitt nú fólkaskúlabygging í kommununum verður veittur úr.

Allar útreiðslur til undirvísingarmál eftir uppskotinum eru tilsamans 187,4 mill. kr. Av hesum verður endurgoldið úr ríkiskassanum 98,9 mill. kr., kommunurnar gjalda 4,5 mill. kr., og aðrar inntøkur v.m. eru 2,8 mill. kr. Á henda hátt verða allar útreiðslurnar hjá landskassanum til undirvísingarmál 81,2 mill. kr. Nærri greining av endurgjaldinum sæst av viðmerkingunum til hvørja konto sær.

Tann hækking í samlaðu útreiðslunum til undirvísingarverkið frá 1981/82 - 1982/83, sum er 20,1 mill. kr. er sundurbýtt millum hesar konti: 2210 Fólkaskúlin 13,2 mill. kr., 2220 Studentaskúlin 2,0 mill. kr. og aðrar konti 4,8 mill. kr.

Viðmerkingar frá Landsskúlaráðnum.

Viðmerkingar til uppskot frá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.

Landsskúlaráðið mælir til, at meira verður gjørt til tess at minka um yvirtímanýtsluna á teimum skúlum, har nógv yvirtímaløn verður goldin.

Landsskúlaráðið mælir til, eins og gjørt var í viðmerkingunum til uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1981/82, at eins reglur verða at galda fyri allar næmingar, hvat viðvíkur veitan av studningi til flutning, mat, bústað og møguleika fyri at læna skúlahøkur.

Ad konto 3130 Ítrótta- og skúlabyggigrunnur.

Á hesi konto stendur undir »játtan 1981/82« 10. mió. kr. Landsskúlafyrisitingin er vitandi um, at Føroya Løgting til hesa konto bert játtaði 1. mió. kr., meðan 9 mió. kr. skuldu útvegast við lántøku.

Orsøkin til at tað talið, 10. mió. kr., sum var við í tí upprunaliga uppskotinum er tað tal, sum samsvarar við tað játtan, sum ríkismyndugleikarnir hava givið til skúlabygging, og sum roknað var við at tørvur varð á.

Viðmerkingar til tær einstøku konti.

Ad 605,620,660 og 780 Endurgjald og ymsar inntøkur

Tær uppgivnu peningaupph. á hesum konti eru ávikavist samlaða endurgjaldið og inntøktur á øllum útreiðslukonti innan § 14. Í viðmerkingunum til tær einstøku útreiðslukonti er upplýst býtið av útreiðslum til landskassan, ríkiskassan, kommunurnar o.o.

Ad 2200 Útreiðslur viðvikjandi undirvísingarverkinum sum heild.

Markið millum teir einstøku undirvísingarstovnarnar er ikki skarpt.

Lærararnir á teimum ymsu stovnunum undirvísa ofta á fleiri ymiskum stovnum; eisini kemur fyri, at somu viðurskifti viðvíkjandi undirvísingini koma fyri á ymiskum stovnum.

Yvirtøkan av skúlafyrisitingini førir við sær, at nógv mál, sum áður hava verið umsitin av ríkisfyrisitingini, nú verða umsitin av Landsskúlafyrisitingini og teimum undirvísingarstovnum, sum liggja undir henni.

Viðvíkjandi sjálvari undirvísingini eru gjørdar ella fara at verða gjørdar lógarbroytingar.

Hesi viðurskifti føra við sær, at í framtíðini verður størri tørvur enn áður á framhaldandi útbúgving fyri lærarar á teimum ymsu undirvísingarstovnunum. Slík

útbúgving kann fara fram á skeiðum, sum verða hildin bæði innanoyggja og uttanlands. Seinastu árini hava t.d. fakfeløg innan fólkaskúlalærarar hildið fleiri stutt skeið í Føroyum.

Tann í uppskotinum nevndi peningur skal brúkast til studning til lærarar, sum skula luttaka í fakligum skeiðum innanoyggja og uttanlands, og til skeið, sum verða fyriskipað av Landsskúlafyrisitingini, fakligum feløgum ella av øðrum.

Tá ið talan er um studning til luttakarar á skeiðum hava allar útreiðslur í sambandi við luttøkuna møguleika at koma við sum grundarlag undir viðgerð av studningsveiting. Vanliga skulu kortini vikarutreiðslur bókast á konto hjá tí einstaka undirvísingarstovni. Støddin á studningi-upphæddini lagar seg eftir hvørjar útreiðslurnar eru, hvat skeið tað er, og hvørjir møguleikar eru fyri studningi frá øðrum.

Sum ein høvuðsregla kunna lærarar frá øllum undirvísingarstovnum undir Landsskúlafyrisitingini fáa studning av hesi konto.

Henda konto skal fyrst av øllum brúkast sum studningur til lærarar á teimum undirvísingarstovnum, sum ikki hava serstaka konto til hetta endamál t.d. í fólkaskúlanum. Hon skal aftrat brúkast í teimum førum, har lærarar luttaka í skeiðum, sum standa í samband við fleiri undirvísingarhættir. Og so kann hon eisini brúkast í teimum serligu førum, tá ið konto-in hjá undirvísingarstovninum er brúkt upp.

Studningur at halda skeið fyri kann verða veittur sum gjald av undirskoti ella sum ávís peningahædd. Støddin á studninginum lagar seg m.a. eftir ti skeiði talan er um, og áðrenn studningurin verður játtaður, skal figgjarætlan fyri skeiðið verða framvegað.

Tað skal viðmerkjast, at av konto *3145* Ferðastudningur/ríkið, verður veittur studningur til fólkaskúlalærarar, sum luttaka í skeiðum uttanlands. Henda konto verður væntandi strikað, tá ið grundarlagið undir hesum studninginum verður broytt.

Við at hava í huga tær útreiðslur, sum hava verið til fólkaskúlan og tann vaksna tørvin, verður mælt til at seta 338.000 kr. á hesa konto, hetta er 12,7% vaksið sammett við játtanina 1981. Fyri verða goldnar úr landskassanum.

Landsskúlaráðið setir almennar reglur fyri, hvussu hesin peningur skal brúktur.

Ad 2210 Fólkaskúlin.

Henda konto kann býtast upp í hesar undirkontur:

í 1000 kr.			Uppskot stovnsins	Uppskot landsstýrisins
Konto	**R. 80/81**	**J. 81/82**	**82/83**	**1982/83**
605 Endurgjald/ríkið	— 56.500	— 51.200	— 55.100	— 55.100
620 Endurgjald/kommunur	— 2.300	— 2.700	— 3.000	— 3.000
Endurgjald tilsamans	— 54.200	— 53.900	— 58.100	— 58.100

1012	Løn/lærarar	74.600	74.500	86.000	86.000
1055	Eftirløn	5.900	6.500	7.500	7.500
2506	Skúlabarnaflutningur	5.000	5.300	6.000	6.000
2581	Ymsar útreiðslur	250	250	275	275
	Samlaðar útreiðslur	85.750	86.550	99.775	99.775
	Partur landskassans	26.950	32.650	41.675	41.675

Ad 605 Endurgjald/ríkið.

Ríkiskassin endurrindar 55% av læraralønunum sbr. § 45, 2. stk. í læraralønarlógini. Endurgjaldsparturin fyri eftirlønir er 80% sbr. § 46 í læraralønarlógini. Ríkið endurrindar 25% av útreiðslunum til skúlabarnaflutning sbr. § 35, 6. stk. í fólkaskúlalógini og konto 2581. Aðrar útreiðslur (studning til 8. og 9. flokk). Konto 3143 fevnir bert um ríkisútreiðslur og er á tí donsku fíggjarlógini 1981 9.000 kr. til fríttíðarskeið fyri lærarar.

Ad 620 Endurgjald/kommunur.

Henda konto fevnir um part kommununnar í skúlabarnakoyringini og part kommununnar í kvøldskúlaútreiðslunum. Aðrar rakstrar- og byggiútreiðslur hjá kommununum viðvíkjandi fólkaskúlanum eru ikki tiknar við, við at upplýsingarnar um hetta eru ov ótryggir. Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at vera u. 15-20% av samlaðu útreiðslunum.

Ad 1012 Læraralønir.

Lønirnar eru settar í tí lønarlagi, sum var galdandi 1. juli 1981. Í skúlaárinum 1981/82 er 8.120 næmingar í fólkaskúlanum og lisnir verða umleið 14.600 læraratímar um vikuna; hetta svarar til uml. 16.600 lønartímar. Í 1980/81 vóru 8.220 næmingar og lisnir vórðu u. 14.400 læraratímar um vikuna; hetta svarar til uml. 16.500 lønartímar. Roknað verður bert við einum lítlum vøkstri í næmingatalinum og eini broyting í býtinum av næmingum í teimum ymisku árgangunum við fleiri í teimum eldru árgangunum og færri í teimum yngru. Hetta kann bera í sær eina lítla øking av lisnum vikutímum í 1981/82.

Henda konto fevnir — umframt um tær veruligu lønarútreiðslurnar til lærarar — somuleiðis um vikarútreiðslur bæði til skipað og ikki sett størv og til ikki-sett størv og vikarútreiðslur í sambandi við skeiðuppihald ella sjúku hjá lærarum. Av hesi konto verður somuleiðis flutningssamsýning o.s.fr. goldið í samband við starvssetan læraranna. Lønarútreiðslur til tey starvsfólk, sum arbeiða í Landsskúlafyrisitingini, deild fyri fólkaskúlan v.m., og sum hava eina pædagogiska útbúgving, verða eisini goldnar av hesi konto.

Tann 30. september 1981 vóru lønarútreiðslur v.m. uml. 77 mill. kr. fyri 1 ár. Sambært vegleiðingar landsstýrisins eru lønirnar hækkaðar við 5 dýrtíðarviðbótum fyri hvønn undirvísara og 5% lønarvøkstur, og harafturat 1,5% í frítíðarløn.

Ríkið endurrindar sum áður nevnt 55% av útreiðslunum á hesi konto. Nettoútreiðslur landskassans verða sostatt 38,7 mill. kr.

Ad 1055 Eftirlønir.

Mett verður, at tallið á eftirløntum lærarum hækkar eitt sindur. Annars er roknað við somu hækking í eftirlønum sum í læraralønum.

Ríkið endurrindar 80% av øllum eftirlønarútreiðslum, sbr. § 46 í læraralønarlógini. Í landskassans partí av eftirlønarútreiðslunum, 1,5 mill. kr., verða renturnar av eftirlønargrunnsins ognum drignar frá. Hesar eru uml. 34.000 kr.

Ad 2506 Skúlabarnaflutningur.

Á hesi konto eru nú allar útreiðslur til skúlakoyring tiknar við. Eisini útreiðslur eftir § 35 í fólkaskúlalógini um tilskot til útreiðslur foreldranna fyri uppihald hjá næmingum, sum einans kunnu fáa framhaldsskúlaundirvísing við ein skúla, har dagligur flutningur millum heim og skúla hevði verið serliga ótryggur, drúgvur og kostnaðarmikil.

Til slíkar næmingar verður veittur studningur sambært kostnaðaruppgerð, tó hægst 11.000 kr. um árið fyri hvønn næming. Hetta tal 11.000 kr. um árið er tað sama, sum verður veitt fyri at hava børn til fostur.

Av útreiðslunum á hesi konto rinda kommununrnar 3. mill. kr. og ríkið 1,5 mill. kr.

Netto-útreiðslur landskassans til hesa konto verða sostatt 1,5 mill. kr.

ad 2581 Ymsar útreiðslur.

Í nýggju fólkaskúlalógini er realdeildin avtikin. Síðsta skúlaár vóru tí allir næmingar í 9. árgangi at ganga í felagsflokkum.

Tey seinastu árini hevur uml. 1/3 av næmingunum gingið í 8. - 9. flokki og 2/3 í realdeildini. Studningur fyri næm. í 8. - 9. flokki verður latin við 2. kr. um tíman sambært gomlu fólkaskúlalógina § 15 stk. 8, samanborið við § 12 í lóg nr. 233 frá 7. juni 1968 um frítíðarundirvísingina o.a. Nevnda grein er varðveitt við rammulógini fyri fólkaskúlan, sum annars avtekur gomlu fólkaskúlalógina.

Av hesi konto endurrindar ríkið 50% ella 137.500 kr.

So statt verður landskassans partur 137.500 kr.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið.

Almennar viðmerkingar

Í hesum fíggjarlógaruppskoti fevnir rakstrarstað 2216 um HF-deildina í Klaksvík og Gøtu.

Á studentaskúlanum og HF-skeiðunum verða lisnir 1809 tímar um vikuna, harav 402,5 sum yvirtíð í skúlaárinum 1981/82. Tímarnir eru býttir soleiðis: Í Hoydølum 1192 tímar um vikuna, harav 271,75 sum yvirtíð; Klaksvík-Gøtu 356,5 tímar um vikuna, harav 73,75 tímar sum yvirtíð; Suðuroy 260 tímar um vikuna, harav 57 sum yvirtíð.

Til komandi skúlaár 1982/83, verður roynt at seta fleiri lærarar í starv, um so er at kvalifiseraðir lærarar eru at fáa fatur á. Roynt verður, at mest møguligir tímar verða lisnir sum vanligir tímar, men vegna tørvin á kvalifiseraðum lærarum og faksamanseting, kann neyvan sleppast undan yvirtímum. Eisini eigur at verða havt í huga, at sambært burðartølini kann væntast, at næmingatalið ikki fer at vaksa eins skjótt tey komandi árini, sum tað hevur tey seinastu. Av hesi orsøk er ikki ráðiligt at seta ov nógvar lærarar í starv nú.

Tað eru 81 fólk í alt, sum undirvísa á studentaskúlanum — HF-skeiðunum, tó hava fleiri av hesum fólkum bert fáar tímar um vikuna.

Yvirtíðin er heldur ójavnt býtt millum lærararnar:

34 lesa ongan yvirtíma um vikuna, 17 lesa 0 - 5 yvirtímar um vikuna, 24 lesa 5 - 10 yvirtímar um vikuna, 9 lesa 10 - 15 yvirtímar um vikuna og 2 lesa yvir 15 yvirtímar um vikuna.

Í alt lesa 673 næmingar í 32 flokkum á studentaskúlanum og HF-skeiðunum. Í Hoydølum eru 515 næmingar í 23 flokkum; størsti flokkur hevur 24 næmingar og minsti 16. Í Klaksvík og Gøtu eru 101 næmingar í 5 flokkum, Í Suðuroy eru 57 næmingar í 4 flokkum; størsti flokkur hevur 19 næmingar og minsti hevur 8.

Fyri at seta á stovn ein tilvalsbólk á HF-skeiðunum, krevst í Hoydølum 5 næmingar og í Suðuroy 3 næmingar. Í Suðuroy verður undirvíst í tveimum støðum við fleiri tilvalsbólkum; hetta ber í sær, at lisnir verða fleiri tímar fyri hvønn næming enn á hinum støðunum, um útreiðslurnar sambært U 1982/83, verða býttar á ávikavist lisnar tímar og talið av næmingum, so sæst, at útreiðslurnar fyri hvønn lisnan tíma eru væl lægri enn miðaltalið fyri hini støðini, meðan útreiðslurnar býttar á talið av næmingum eru væl hægri. Slík paralellundirvising merkir, 1) at lærarar skulu flytast millum plássini; henda flutning má landskassin gjalda, 2) at undirvisingin í einstøkum fakum kann gerast dýrari enn neyðugt.

Í sambandi við studentaskúlan og HF-skeiðini eru nakrir principiellir spurningar, sum verða at taka støðu til, nevniliga um hvørjar reglur skulu galda fyri studningsveitan til tey lesandi. Sum er, verður studningur veittur til næmingarnar í Suðuroy soleiðis, at summir fáa koststudning, meðan onnur fáa studning til flutning.

Landsskúlaráðið hevur góðkent, at næmingarnir á HF-skeiðinum í Gøtu fáa flutningsstudning, sum svarar til helvtina av flutningskostnaðinum. Ynskiligt er, at eins reglur koma at galda fyri allar næmingar, soleiðis at næmingar, sum hava fyri neyðini antin at koyra burtur úr bygd til og frá skúla ella at búgva heimanífrá, fyri at ganga í skúla, fáa somu sømdir. T.d. kann hugsast, at veitlur verður studningur, sum er fastur procentpartur av, hvat vanligar flutnings- ella bústaðarútreiðslur eru. Tey, sum koyra dagliga, kunnu kanska fáa 50% av flutningsútreiðslunum sum studning. Eisini skal í hesum sambandi havast í huga, at næmingarnir sum ganga á HF-skeiðinum í Suðuroy, fáa skúlabøkurnar ókeypis frá skúlanum. Avgjørt eigur at verða, um allir næmingar við studentaskúlan og HF-skeiðini eisini skulu njóta henda fyrimun.

Viðvíkjandi konto 1120 - Ferða- og dagpeningur, er at siga, at higartil hava 10 lærarar, 8 úr Hoydølum og 2 av bygd, havt høvi til at verða á skeiði í Danmark hvørt ár. Av tí at læraratalið í Hoydølum er vaksið sera nógv, er neyðugt, at 12 úr Hoydølum og 2 av bygd sleppa á skeið um árið.

Hølini, sum rúma HF-næmingum í Klaksvík og Gøtu, eru umleið sama tal í báðum støðum, og roknað verður tí við somu upphædd til reingerð, el, hita, vask og ognartrygging á báðum støðum.

Tað eru 3 HF-flokkar í Gøtu frá august 1981, tí verður søkt um somu upphædd til telefon, men hægri til ekskursiónir og skrivstovuútreiðslur í Gøtu sum í Klaksvík.

Viðvíkjandi lønarútreiðslum fyri rakstrarstað 2216, kann roknast við, at hesar fara at verða eitt sindur hægri enn tann í uppskotinum nevnda upphædd.

Hetta kemst av, at teir lærarar, sum ferðast millum HF-skeiðini í Klaksvík og Gøtu fáa tímalækkan fyri ferðatíðina.

Figgjaruppskot fyri rakstrarstað **nr. 2215**, HF-skeiðið í Suðuroy,
figgjarárið 1982/83.

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
780 Leiguinntøkur	0	— 7.0	— 7.0	— 7.0
1016 Løn/sáttmálaløn	721.009	869.8	759.7	759.7
1022 Løn/reingerð	20.820	21.6	38.5	38.5
1028 Løn/onnur	0	4.5	4.0	4.0
1029 Tímaløn	461.668	400.0	595.6	595.6
1040 Úrtíðarlønir	434.400	280.0	540.2	540.2
1050 Samsýningar	23.664	13.0	13.0	13.0
1120 Ferða- og dagpeningur	219.942	161.0	197.0	197.0
2110 El, hiti og vask	20.481	20.0	22.0	22.0

2140 Umvælingar v.m.	913	0.0	1.0	1.0
2170 Ognartryggingar	529	0.6	1.0	1.0
2180 Leiguútreiðslur	52.673	60.6	69.0	69.0
2305 Innbúgv	1.810	25.0	25.0	25.0
2315 Prentlutir	12.362	35.0	15.0	15.0
2325 Postgjald	938	1.2	1.5	1.5
2335 Telefon og telex	13.542	12.0	12.0	12.0
2340 Leiga av maskinum	41.404	20.0	40,0	40.0
2356 Aðrar skrivstovu-útreiðslur	899	1.0	1.0	1.0
2507 Ekskursiónir	15.448	15.0	17.0	17.0
2508 Bókakeyp og innbinding	20.850	15.0	40.0	40.0
2509 Søvnini	46.678	30.0	30.0	30.0
2514 Kost og logi	2.751	15.0	15.0	15.0
2590 Aðrar útreiðslur	6.243	4.7	6.0	6.0
2215	2.119.029	1.998.0	2.436.5	2.436.5

Frágreiðing:

Ad 1120 Ferða- og dagpeningur.

1) Lærarar úr Hoydølum	40.000,- kr.
2) Flutningur av lærarum og næmingum millum Vág og Tvøroyri, og flutningur av avbygdanæmingum	150.000,- kr.
Tilsamans	190.000,- kr.

Hækkingin frá seinasta fíggjarári er, orsakað av øktum næmingatali og hækkaðum bensinprisi.

Ad 2180 Leiguútreiðslur.

1) Leiga av húsi í Vági	43.200,- kr.
2) Leiga av ítróttahøll	5.800,- kr.
3) Leiga av kollegium	20.000,- kr.
Tilsamans	69.000,- kr.

Í løtuni hava vit einki kollegium, men søknasr eftir einum, og tí skjóta vit upp, at halda fast við 20.000,- kr. til leigu av kollegium, um møguleiki visir seg seinni.

Ad 2315 og 2340-Prentlutir og leiga av maskinum.

Samanlagt geva 2315 og 2340 tað samun, sum varð játtað í fíggjarárinum 1981/82	55.000,- kr.

Lækkingin av 2315 og tilsvarandi hækking av 2340 er lagað eftir okkara tørvi.

Ad 2508 Bókakeyp og innbinding.

1) Føroysk bløð, eitt eintak av hvørjum í Vági og á Tvøroyri. Útlendsk avís. Ymisk tíðarrit	10.000,- kr.
2) Føroyskar bókmentir (klassasett)	15.000,- kr.
3) Klassasett av ársfrágreiðing frá Føroya Landsstýri og ymiskar útlendskar statistiskar árbøkur	3.000,- kr.
4) Ajourføring av bókasavni og neyðugt tilfar til prøvtøku	12.000,- kr.
Tilsamans	40.000,- kr.

P.E.S.

Ad 1016 Sáttmálaløn.

Bruttolønir pr. 1/10 1981 (fastar lønir).

Adjunktar (7), kr. 624.264. Roknað verður við 10% príshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83, harafturat 1,5% frítíðarløn. Tilsamans kr. 727.267.

Aftur at hesum mugu roknast ikki-eftirlønargevandi viðbøtur og undirvísingarviðbøtur kr. 32.419.

Tilsamans: **Kr. 759.686.**

Sí annars skjal 1.

Ad 1029 Tímaløn.

Lønir pr. 1/10 1981. Tímalærarar (9), kr. 511.224. Roknað verður við 10% príshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83, harafturat frítíðarløn 1,5%.

Tímaløn tilsamans: **Kr. 595.575.**

Ad 1040 Úrtíðartænir.

Kr. 469.728. Roknað verður við 10% príshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83.

Tilsamans: **Kr. 540.187.**

Sí annars skjal 1.

viðm. A.M., rektari

SKJAL 1

Suðuroyar HF:

	Føst løn	Yvirtíð	Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10%
Adjunktur	119.928 kr.	30.972 kr.	11.992 kr.
—	114.060 kr.	55.752 kr.	11.406 kr.
—	143.016 kr.	198.240 kr.	14.302 kr.
—	51.000 kr.	36.096 kr.	5.100 kr.
—	96.372 kr.	83.244 kr.	9.637 kr.
—	55.860 kr.	56.700 kr.	5.586 kr.
—	44.028 kr.	8.724 kr.	4.403 kr.
Tilsamans	624.264 kr.	469.728 kr.	

Tímalærari	131.016 kr.
—	13.104 kr.
—	10.476 kr.
—	52.068 kr.
—	170.376 kr.
—	30.144 kr.
—	61.056 kr.
—	7.980 kr.
—	35.004 kr.
	511.224 kr.

Viðvíkjandi hækkingum, sí viðm. til konti 1029, 1016 og 1040.

Fíggjarlógaruppskotið fyri rakstrarstað **2216,**
HF-skeiðið í Klaksvík og Gøtu fíggjarárið
1982/83

Konto	**Roknskapur 1980/81**	**Játtan 1981/82**	**Uppskot stovnsins 1982/83**	**Uppskot landsstýrisins 1982/83**
1016 Løn/sáttmálaløn	576.051,91	700.000	957.200	957.200
1022 Løn/reingerð	90.760,00	110.000	130.000	130.000
1028 Løn/onnur	310,00	10.000	14.000	14.000

1029 Tímaløn	444.268,43	473.100	810.200	716.260
1040 Úrtíðarløntir	223.344,74	159.600	708.100	708.100
1050 Samsýningar	18.330,04	12.000	23.200	23.200
1120 Ferða- og dag-peningur	74.373,60	170.000	416.000	416.000
2110 El, hiti og vask	45.885,01	80.000	100.000	100.000
2140 Umvælingar v.m.	12.861,03	27.000	100.000	100.000
2170 Ognartrygging	280,00	1.000	4.300*	4.300
2180 Leiguútreiðslur	46.325,00	87.000	30.000	30.000
2305 Innbúgv	48.663,00	40.000	70.000	70.000
2315 Prentlutir	7.552,46	40.000	50.000	50.000
2325 Postgjald	1.217,95	2.000	3.500	3.500
2335 Telefon og telex	7.973,15	20.000	20.000	20.000
2340 Leiga av maskinum	22.184,57	25.000	70.000	70.000
2356 Aðrar skrivstovu-útreiðslur	3.741,50	9.000	16.000	16.000
2507 Ekskursiónir	3.584,00	12.000	18.000	18.000
2508 Bókakeyp og innbinding	29.522,48	70.000	120.000	120.000
2509 Søvnini	30.281,87	140.000	199.000	199.000
2514 Kost og logi	10.400,00	16.000	8.000	8.000
2590 Aðrar útreiðslur	9.888,68	12.300	25.000	25.000
2216	1.710.895,67	2.216:000	3.892.500	3.892.500

* (2.600)

Fíggjaruppskot 1982/83, Klaksvíkar/Gøtu HF-skeið.

Frágreiðing:

Ár 1980 kom ein klassi í Gøtu. 1981 komu 2 klassar aftrat. Roknað verður tí við, at HF í Gøtu hevur 4 klassar í 1982, ella umt. 80 næmingar. HF í Klaksvík fær neyvan meira enn vanligt: Ein nýggjan klassa um árið og hevur sostatt 2 klassar um árið.

Meðan játtanin í 1980 var roknað til 2 klassar ella umt. 40 næmingar, var játtanin í 1981 roknað til 4 klassar (2 í Klaksvík og 2 í Gøtu), at ein eyka klassi kom í 1. HF í Gøtu kundi ikki forútsigast tá. Neyðugt var tí at søkja um eykajáttan til umvælingar av eyka hølum í Gøtu í hesum fíggjarári, 1981/82. Komandi fíggjarár eru tølini mett

til 6 klassar, t.v.s. at fyri uttan pris- og lønarvøkstur sum heild eru tølini fyri 1981 deild við 4 og faldað við 6.

Óvist er í løtuni, um landsins keyp av HF-hølunum í Klaksvík verður til nakað, tí er ikki gjørligt at rokna leiguútreiðslur og leiguinntøkur út uttan so, at mett verður um hesar við ella uttan keyp av hølunum. Tølini eru harumframt roknað út við tí treyt, at HF verður verandi í Gøtu.

Ad 1022 Løu/reingerð.

Roknað verður við uml. 4 tímar arbeiði pr. dag í Klaksvík og í Gøtu, hvat ið higartil hevur kostað árl. 55.000 kr. í hvørjum stað. Vegna lønarvøkstur verður skotið upp 65.000 kr. í hvørjum stað, t.v.s. tilsamans 130.000 kr.

Ad 1028 Løn/ouvur.

Í staðin fyri at hava fastan skúlatænara brúka vit ymisk fólk til fyrifallandi arbeiði, tí hetta er biligari. T.d. kann nevnast: Flyting av stólum og borðum millum Klaksvíkar HF-skeið og húsarhaldsskúlan, har næmingarnir taka skrivliga prógtøku, smáumvælingar, koyring av pakkum frá Strandferðsluni til HF, innkeyp fyri skúlarnar, hjálp til uppvartan tá ið næmingarnir fáa prógtøkuskjølini o.a.

Vegna lønarvøkstur verður skotið upp 7.000 kr. pr. stað, tilsamans 14.000 kr.

Ad 1050 Samsýningar.

Til prógtøkuansarar.

Í hvørjum staði verður roknað við uml. 9-10 skrivligum royndum. Hertil krevjast 2 fastar vaktir uml. 7-8 tímar um dagin, tá ið roknað verður við, at vaktirnar skulu møta minst 1/2 tíma áðrenn næmingarnir og fara heim minst 1 tíma aftaná, vegna upprudding o.a.tl. Hetta gevur eitt vakttímatal upp á uml. 60 tímar x 4 vaktir (2 í Klaksvík og 2 í Gøtu) = 240 tímar x uml. 55,00 kr. = **13.200 kr.**

Tíl felagstímar,
av almennum áhuga roknast við uml. 10 fyrilestrum á 500 kr. í hvørjum stað, tilsamans **10.000 kr.**

Samsýning Klaksvík og Gøta tilsamans: **23.200 kr.**

Ad 1120 Ferða- og dagpeningur.

Til ferðing til lærarar millum Tórshavn-Gøtu og Gøtu-Klaksvík og til ferðing til næmingar, (roknað verður við 80 í tali) til og frá HF í Gøtu, har tað almenna hevur átikið sær helvtina av útreiðslunum, verður vegna prísvøkstur og vaksandi tal av bæði næmingum og lærarum søkt um **416.000 kr.**, roknað soleiðis út:

Miðaltaxaprísur pr. ár pr. næming, 5.000 kr. (í mesta lagi). 5.000 kr. x 80 næm. = 400.000 kr. Herav verða **200.000 kr.** goldnar av tí almenna. Flyting av 12 ferða-lærarum í miðal 3 ferðir um vikuna Klaksvík-Gøtu ella Tórshavn-Gøtu: 150 kr.

(ferja og bensin) x 3 x 12 x 40 vikur = 216.000 kr. Her má viðmerkjast, at tá eingin almenn ruta er í Eysturoynni og privattaxair ikki altíð eru til taks, mugu lararnir oftast taka egnan bil við yvirum fyri at vera vissir í at koma fram til tímarnar.

Henda upphædd verður munandi reducerað, um tað eydnast at fáa eina bussrutu til rímiligan pris til næmingarnar, men hetta kann eingin vera sikkur í fer at eydnast hvørt ár.

Ad 2110 El, hiti og vask.

Vegna prísvøkstur verður skotið upp 50.000 kr. pr. stað; t.v.s. 100.000 kr.

Ad 2140 Umvælingar v.m.

Klaksvík	40.000 kr.
Gøta	60.000 kr.
Tils.	100.000 kr.

Av tí at hølini í Klaksvík treingja harðliga til umvæling aftaná 5 ára nýtslu, og peningurin, sum varð søktur til hetta endamál nú tvey ár á rað eru farnir til HF-hølini í Gøtu, sum vóru enn verri fyri, verður nú søkt um 40.000 kr. t.v.s., at umvæling av einum rúmi má roknast til minst 4.000 kr. og roknað verður við umvæling av 10 rúmum í Klaksvík (ávikavist veggir, loft, gólv, vindeygu o.tl.).

Til Gøtu verður søkt um 60.000 kr., tí vit rokna við umbygging av íbúðini í ovastu hædd, har nakrir veggir mugu brótast niður fyri at skaffa eitt eyka klassarúm. Hartil kemur nýggj gólválegging á ovastu hædd. El-arbeiði og handverkaraløn má eisini takast við.

Ad 2170 Ognartryggingar.

Her er ynskiligt at tryggja innbúgvið og tólini, sum nú verða mett til eitt virði av 500.000 kr. í hvørjum stað. Tryggingargjald 1.300 kr. pr. stað, t.v.s. **2.600 kr.** tils. Um HF í Klaksvík verður landsins ogn tó 3.000 kr. í Klaksvík, t.v.s. 4.300 kr. tilsamans.

Ad 2180 Leiguútreiðslur.

Um hitt almenna keypir HF-hølini í Klaksvík, verða ongar leiguútreiðslur her, men í Gøtu 12.000 kr. árliga. Hinvegin, um húsakeypið ikki kemur í lag, kann roknast við prísvøkstri í leiguútreiðslunum í Klaksvík til ein møguligan nýggjan eigara av hølinum. (Uml. 10.000 kr.). Aðrar leiguútreiðslur eru leiga av hølum til prøvtøkunýtslu, sum klassarúmini ikki kunnu rúma. Skrivlig prøvtøka: 10 ferðir 500 kr. pr. stað = 5.000 x 2 = **10.000 kr.** í Klaksvík og Gøtu tilsamans. Leiga av hølum til ítrótt og svimjing í Klaksvík: 8.000 kr. árliga. Leiguútreiðslur tilsamans (um HF í Klaksvík verður almenn ogn) 30.000 kr.

Ad 2305 Innbúgv.

Ein eyka klassi í Gøtu næsta ár krevur borð og stólar fyri 20.000 kr. Hartil krevjast reolir fyri umt. 10.000 kr., skrivstovuinnbúgv fyri 10.000 kr., talvur fyri 10.000 (talvurnar í Klaksvík eru slitnar nú aftaná 5 árs brúk), lampur fyri 20.000 kr., harav helvtin til endurnýggjan av uppslitnum vánaligum lampum í Klaksvík.

Tilsamans 70.000 kr. til innbúgv.

Ad 2315 Prentlutir.

Vegna prísvøkstur uppá pappír verður skotið upp: 50.000 kr.

Ad 2325 Postgjald.

Vegna hækking av postgjaldinum og meira skrivstovuarbeiði verður skotið upp: 3.500 kr.

Ad 2340 Leiga av maskinum.

3 klassar brúktu í 1980 umt. 22.000 kr. til kopiering. Nú koma 6 klassar, og HF í Gøtu hevur atgongd til kopimaskinu, sum Gøtu kommuna eigur, men skal gjalda fyri kopiering. Tí verður roknað við tvífaldan av kopiútreiðslunum + prísvøkstur í leiguútreiðsiunum: 70.000 kr.

Ad 2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur.

Klaksvík	4.000 kr.
Gøta	6.000 kr.

Tils. 10.000 kr. + 6.000 kr. til eina elektriska skrivimaskinu, tí skrivstovuarbeiðið veksur munandi í Gøtu. Tilsamans **16.000 kr.**

Ad 2507 Ekskursiónir.

3.000 kr. pr. klassa. 6 klassar = 18.000 kr.

Ad 2508 Bókakeyp og innbinding.

Til viðlikahald av verandi bókasavni í HF í Klaksvík: Roknað verður við 2.000 kr. pr. lærugrein, 20 lærugreinir = 40.000 kr. tilsamans.

Í Gøtu:

Her krevst tað dupulta, tí at bert heilt fáar bøkur eru til taks fyribils, soleiðis at 4.000 kr. pr. lærugrein ikki er ov nógv. Eitt bókasavn á HF-niveau er ikki til í Eysturoy. Tilsamans 80.000 kr.

Klaksvík og Gøtu tilsamans: **120.000 kr.**

Ad 2509 Søvnlut.

Tíl viðlikahald av verandi søvnum í biologi, landalæru, fiskivinnu, matematikk, data-læru og tónleik verður skotið upp 5.000 kr. pr. lærugrein = 30.000 kr. Til AV-

tól til málundirvising verður skotið upp: 10.000 kr. (ein hampuligur bandupptakari er ikki til at fáa fyri undir 2.000 kr.). HF i Gøtu er ikki væl fyri viðvikjandi AV-tólum. Til episkop, overhead-projektor, ljósmyndatól og filmsapparat ynskisi 35.000 kr. Hetta verður neyðugt fyri so líðandi at avlasta Gøtu Skúla, sum lænir okkum sínt tól i løtuni.

Klaksvík (kemi):	
Forbrúk av kemikalium	4.000 kr.
Forbrúk av glasvørum	3.000 kr.
Málitól (pH-metur, temp.følarar)	8.000 kr.
Klaksvík (fysikk):	
Nýkeyp av apparatum	26.000 kr.
Reparatiónir	3.000 kr.
Gøta (kemi):	
Kemikallir	8.000 kr.
Glasvørur	6.000 kr.
Málitól (pH-metur, temp.føl., vekt)	15.000 kr.
Gøta (fysikk):	
Nýkeyp av apparatum	46.000 kr.
Reparatiónir	5.000 kr.

Viðmerkingar:

Kemi/fysikk søvnini í Klaksvík eru enn langt frá fullfíggjað, men við teirri hjálp, sum Klaksvíkar skúli veitir (lokalir og apparatir) klára vit okkum so nøkunlunda. Tess vegna er upphæddin hesaferð lægri enn seinasta ár.

Í Gøtu er tørvurin vaksandi (fleiri næmingar), men umbidna upphæddin er tann sama sum í fjør (prísvøkstur er **ikki** tikin við). Gøtu skúli hjálpir við lokalum, men næstan ikki við apparatum — teir hava jú onga framhaldsdeild.

Samanumtikið: Ein roynd at tálma útreiðslurnar !!!!

Søvnini samlaðar útreiðslur: 199.000 kr. fyri allar lægrugreinir.

Ad 2514 Kost og logi.

Næmingar úr Eysturoy gista ikki longur í Klaksvík, men roknast kann enn við næmingum aðrastaðni frá, t.d. 2 um árið, ti plásstrot er í Tórshavn. Ti verður skotið upp 8.000 kr. (2 næmingar árliga á 4.000 kr. á Lærlingaheiminum í Klaksvík).

H.H.

Viðmerkingar.

Ad 1016 Løn/Sáttmálalønt.
Bruttolønir pr. 1. oktober 1981.
Adjunktar (11), 791.172 kr. Roknað verður við 10% pristalshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83, harafturat 1,5% fritíðarløn.
Tilsamans: 921.715 kr.
Aftur at hesum mugu roknast ikki-eftirlønargevandi viðbøtur og undirvísingarviðbøtur: 35.523 kr.
Tilsamans **kr. 957.238.**

Ad 1029 Timaløn.
Lønir pr. 1. oktober 1981. Timalærarar (15), 695.376 kr. Roknað verður við 10% pristalshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83, harafturat 1,5% fritíðarløn.
Tilsamans: **810.113 kr.**

Sí annars skjal 1

Ad 1040 Úrtíðarlønir.
615.756 kr. Roknað verður við 10% pristalshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83.
Tilsamans: **708.119 kr.**
Sí annars skjal 1.

A.M. rektari

SKJAL 1.

Klaksvík/Gøtu HF-skeið.

	Føst løn	Yvirtíð	Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10%
Adjunktur	138.348 kr.	68.400 kr.	13.835 kr.
—	138.348 kr.	117.708 kr.	13.835 kr.
—	119.928 kr.	76.404 kr.	11.993 kr.
—	107.112 kr.	136.296 kr.	10.711 kr.
—	119.928 kr.	120.000 kr.	11.993 kr.

—	43.272 kr.	7.176 kr.	4.327 kr.
—	6.492 kr.	7.488 kr.	0.649 kr.
—	47.796 kr.	8.028 kr.	4.780 kr.
—	50.124 kr.	66.000 kr.	5.012 kr.
—	10.224 kr.	4.800 kr.	1.022 kr.
—	9.600 kr.	3.456 kr.	960 kr.
Tilsamans	791.172 kr.	615.756 kr.	

Timalærari	86.496 kr.
—	128.436 kr.
—	50.280 kr.
—	15.876 kr.
—	23.832 kr.
—	59.172 kr.
—	23.820 kr.
—	42.024 kr.
—	164.472 kr.
—	10.584 kr.
—	10.488 kr.
—	10.476 kr.
—	9.036 kr.
—	25.980 kr.
—	34.404 kr.
Tilsamans	695.376 kr.

Viðvíkjandi hækkingum, sí viðmerkingar til konti 1016, 1029 og 1040.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Føroya
Studentaskúla og HF-skeið í Hoydølum
fíggjarárið 1982/83, raksturarstað
2220

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
				(1000 kr.)
780 Leiguinntøkur	— 7.700,00	— 5.0	— 6.0	— 6.0
1004 Løn/tænastumenn	820.722,89	906.1	948.1	948.1
1014 Løn/starvsfólk	215.994.09	239.9	252.4	252.4
1016 Løn/sáttmálaløn	4.021.678,78	5.388.7	5.626.3	5.626.3
1022 Løn/reingerð	420.019,24	478.0	591.4	591.4
1028 Løn/onnur	4.147,10	9.2	10.0	10.0
1029 Tímaløn	436.741,39	450.0	884.9	884.9
1040 Úrtíðarlønir	2.233.478,34	1.860.0	3.113.6	3.113.6
1050 Samsýningar	149.583,03	14.0	23.0	23.0
1120 Ferða- og dag-peningur	94.162,10	84.0	35.0	35.0
2110 El, hiti og vask	319.026,45	372,5	406.5	406.5
2140 Umvælingar v.m.	58.900,04	111.0	230.0	230.0
2160 Størri umbyggingar	116.132,49	400.0	0.0	0.0
2170 Ognartryggingar	17.719,00	20.0	55.0	55.0
2180 Leiguútreiðslur	40.680,00	73.0	98.9	98.9
2305 Innbúgv	29.702,65	50.0	81.0	81.0
2315 Prenthlutir	44.794,11	47.0	54.0	54.0
2325 Postgjald	4.108,60	4.0	5.0	5.0
2335 Telefon og telex	16.655,10	25.0	27.0	27.0
2340 Leiga av maskinum	51.255,68	60.0	78.0	78.0
2356 Skrivstovu-útreiðslur	5.590,60	8.0	8.0	8.0
2507 Ekskursiónir	5.205,30	20.0	20.0	20.0
2508 Bókakeyp og innbinding	57.776,51	65.0	65.0	65.0
2509 Søvnini	151.625,40	140.0	180.0	180.0
2585 Vøllurin	0,00	0.0	15.0	15.0
2590 Aðrar útreiðslur	32.682,70	63.6	113.5	113.5
2220	9.340.681,59	10.884.0	12.915.6	12.915.6

Viðmerkingar.

Ad 780 Leiguinntøkur.

Leiguinntøkur eru heilt óvissar. Samkomuhøllin verður við óregluligum millumbilum útleigað, men einki ávist inntøkutal er gjørligt at meta um, og við nógvum fyrivarni verður mett **6.000 kr.**

Ad 1004 Løn/tænastumenn.

Bruttolønir pr. 1. okt. 1981 (fastar lønir).

Rektari, lektor (1), lærarar (2), skúlatænari (1), 850.329 kr. + 10% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, **948.116 kr.**

Sí annars skjal 3.

Ad 1014 Løn/starvsfólk.

1) Skrivstovukvinna, 109.976 kr. + 10% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, 122.623 kr.

2) Hjálparmaður hjá skúlatænaranum, 116.388 + 10% vegna prístalsvøkstur + 1,5% frítíðarløn, 129.772 kr.

1) og 2) tilsamans **252.395 kr.**

Ad 1016 Løn/sáttmálaløn.

Bruttolønir pr. 1. okt. 1981 (fastar lønir).

Lektor (1), adjunktar (35), 4.356.072 kr. Møguleiki er fyri, at næmingatalið í 1982/83 fer at økjast í lann mun, at tað fer at verða 1 flokkur meir enn í ár (24 móti 23, men so er ikki meiri pláss í Hoydølum!), soleiðis at vit mugu rokna við 2 lærarum afturat á 11.000 kr. = 22.000 kr. um mánaðin = 264.0 um árið. Sostatt sáttmálaløn: 4.356.072 kr. + 264.0 = 4.620.072 kr. Roknað verður við 10% prístalshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83, harafturat 1,5% í frítíðarløn. Tilsamans 5.382.383 kr. Afturat hesum mugu roknast ikki-eftirlønargevandi viðbøtur og undirvísingarviðbøtur 243.881 kr.
Tilsamans **5.626.264 kr.**

Sí annars skjal 3.

Ad 1040 Úrtíðarlønir.

1)	Tænastumenn:	258.792 kr.
2)	Sáttmálaløn:	2.448.648 kr.
	Tilsamans	2.707.440 kr.

Roknað verður við 10% prístalshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1983/84. 1) og 2) tilsamans 3.113.556 kr.

Sí annars skjal 3.

Ad 1022 Løn/reingerð.
Vegna økt tal á skúlastovum, og tí meiri reingerðarfólk, og hækkandi lønir ter henda útreiðsla í 1982/83 væntandi at krevja 591.400 kr.

Ad 1028 Løn/onnur.

Fyrifallandi arbeiði, t.d. til næmingar o.o, ið hjálpa til skrásetingararbeiði á bókasavninum, reinskriving av tímatalvu v.m., 10.000 kr.

Ad 1029 Tímaløn.

Lønir pr. 1/10 1981. Tímalærarar (13), 759.588 kr. Roknað verður við 10% prístalshækking pr. 1/4 1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83, haraftrat frítíðarløn 1,5%. Tímalønir tilsamans 884.920 kr.

Sí annars skjal 4.

Ad 1050 Samsýningar.

a) Til felagstímar fyri allar skúlaflokkar (upp í 10 t. um árið), har fólk uttanífrá halda fyrilestrar, spæla tónleik o.a.m., 8.000 kr. (Talið á flokkum er so stórt nú, at samkomuhøllin ikki rúmar øllum í senn, og hvør felagstími má tí avgreiðast í tveimum umførum).

b) Umsjón við skrivligum prógtøkum og royndum 15.000 kr.

a) og b) tilsamans 23.000 kr.

Ad 1120 Ferða- og dagpeningur.

Ferðaútreiðslur v.m. hjá HF-lærarum úr Suðuroy og Klaksvík/Gøtu til Hoydalar 35.000 kr.

Ad 2110 El, hiti og vask.

a) hækkandi el-prísir krevja væntandi 85.00 kr. + ljósperur 8.000 kr. = 93.000 kr.

b) hækkandi oljuprísir krevja væntandi (110 t. á 26,50 (?)) 291.500 kr. -- við øllum hugsandi fyrivarni, eisini viðvíkjandi pkt. a)!

c) vaskievni 22.000 kr.

a), b) og c) tilsamans 406.500 kr.

Ad 2140 Umvælingar v.m.

Upp í hesa konto kemur tað, sum krevst til umvælingar og viðlíkahald av ognini innan og uttan (— innbúgv).

a) viðlíkahald av skúlanum innan, 50.000 kr.

b) viðlíkahald av viðalundini, 10.000 kr.

c) asfaltering av vegnum frá brúnni um Hoydalsá oman til skúlan 150.000 kr. Í hesum sambandi eru hjáløgd skriv frá Landsverkfrøðinginum, dagf. 9. sept. 1981, og kopi av skrivi hiðani til Landsverkfrøðingin dagf. 2. sept. 1981 (skjøl 1 og 2). Hesin vegur er ein tann mest trafikeraði vegur í landinum — ikki undir 1.200 fólk ferðast dagliga oman og niðan hvønn vegin til gongu ella koyrandi. Fyri fíggjarárið 1978/79 varð eftir tilráðing frá Landsverkfrøðinginum søkt um kr. 82.500 til asfaltering, men varð hetta strokið av fíggjarnevndini, hvørs táverandi formaður tó gav lyfti um, at tá ið tann nýggi landsvegurin niðan til Sunds fór at verða asfalteraður, skuldi um somu tíð verða farið undir vegin oman til skúlan og kostnaðurin (helst) verða bildin av Landsverkfrøðinginum. Men enn er einki hent, og vegurin versnar alt meir. Bert smávegis ábøtur eru gjørdar hesi 3 árini, síðan seinast varð søkt um pening til asfaltering.

d) útsúgving av eitrandi evnum (eimi) frá kemi-rúminum er átroðkandi neyðug — eitt krav frá arbeiðseftirlitinum, sum vegna ymsar óhepnar umstøður ongantíð er lokið. Til hetta endamál er fyri inniverandi fíggjarár játtað 51.000 kr., men tiltakið fer við teimum nógv hækkaðu prisunum av verða væl dýrari enn hetla, og fyri 1982/83 má ti verða søkt um 20.000 kr.

a), b), c) og d) tilsamans 230.000 kr.

Ad 2170 Tryggingar.

a) skúlin hevur síðani 1966 verið tryggjaður fyri eitt virði stórt kr. 7.500.000 (tryggingargjald 7.500 kr. árliga). Hetta tryggingarvirði er alt ov lítið í dag, og má tryggingin hækkast munandi. Eftir ráðførslu við umboð fyri Tryggingarsambandið Føroyar verður ti skotið upp til brunatrygging v.m. av skúlabyggingini, innbúgvi, undirvísingaramboðum, bókasavni at seta av kr. 43.000 fyri 1982/83; sí hesum viðvíkjandi hjálagda skjal 5, skriv frá »Tryggingarstovuni« dagf. 8. sept. 1981.

b) vanlukkutrygging av læratum, skúlatænarum, starvsfólki, reingerðarfólki og næmingum í arbeiðstíðini + ábyrgdartrygging 12.000 kr.

a) og b) tilsamans 55.000 kr.

Ad 2305 Innbúgv.

a) gardinur til myrkalegging í biologihøli, 10.000 kr.
b) gardinur og stólar til lærararúmið, 14.000 kr.
c) 30 krakkar til fysikkhøli, 10.000 kr.
d) 4 skúlatalvur, 32.000 kr.
e) innbúgv til lestrarvegleiðingarstovu, 15.000 kr.

a) - e) tilsamans 81.000 kr.

Ad 2315 Prentlutir.

a) pappír til ljósprent (Rank - Xerox), 37.000 kr. Munandi fleiri næmingar (u. 100; tils. eru nú 515 næmingar) eru í hesum skúlaárinum enn í skúlaárinum 1980/81. Í inniverandi *fíggjarári* eru játtaðar 30.000 kr., men hetta verður ov lítið í 1982/83.
b) fotokopiering, 6.000 kr.
c) tilfar til sprittduplikator og fotokopitól (sverta, spritt v.m.), 6.000 kr.
d) pappír v.m. til datatól, 5.000 kr.

a) - d) tilsamans 54.000 kr.

Ad 2340 Leiga av maskinum.

Hækkandi leiga krevur 78.000 kr.

Ad 2508 Bókakeyp og innbinding.

Útreiðslan er (umframt til innbinding) serliga ætlað til øking av bókasavninum við bæði serstøkum bókaverkum og flokssettum til hvørt fakið sær, t.d. keldutilfar til religión, søgu, bókmentir í føroyskum, denskum og fremmandum máli, statistiskt tilfar til søgu, landalæru og samfelagsfrøði, ið *ikki* er at javnmeta við tað, (kostnaðarmikla) læribókatilfar, sum næmingarnir noyðast at keypa sjálvir. Tiðarit koma eisini upp í útreiðsluna. Samanlagt verður tørvurin mettur til 65.000 kr.

Ad 2509 Søvnini.

Næmingatalið er munandi vaksið, og tí er meiri neyðugt av ymsum tólum. Útreiðslan er ætlað til viðlíkahald og endurnýgging/keyp av:

1) fysikktólum. Hesi eru rættiliga kostnaðarmikil, eisini í viðlíkahaldi, og eru fysikklæ rararnir komnir ásamt um at søkja um 35.000 kr. til hetta endamál (og við øktum næmingatali).
2) kemitólum. Til kemikaliir og glasapparatur í ti dagligu undirvísingini krevst við tí økta næmingatalinum tilsamans 30.000 kr.
3) musikktólum, 15.000 kr.
4) geografi-amboðum (kort v.m.), 10.000 kr.
5) biologi-amboðum, 27.000 kr.

6) amboðum til undirvísing í fiskivinnu, 5.000 kr.
7) fimleikaamboðum, 15.000 kr.
8) søgusavni (kort v.m.), 15.000 kr.
9) religiónssavni (kort v.m.), 3.000 kr.
10) samfelagsfrøðisavni, 10.000 kr.
11) tilfari til royndir í ymsum undirvísingarhættum, 5.000 kr.
12) AV-tólum. Umvælingar + myndir, ljóðbond v.m., 10.000 kr.

Søvnini tilsamans 180.000 kr.

Ad 2585 Vøllurin.

Vøllurin tørvar ábøtur. Eitt stórt øki liggur sum mýrulendi og til onga nyttu ella prýði.

Søkt verður um 15.000 kr.

Ad 2590 Aðrar útreiðslur.

Á hesa konto verður sett tað nógva ymiska, sum ikki kann skipast undir hinar konti. Nógv av tí er óvæntanð, ið stingur seg upp gjøgnum árið, og ilt er tí at mela eitt tolulíga haldgott tal.

a) krit verður mett til kr. 9.000.
b) skrivibøkur, pappír v.m. til royndir og prógvtøkur, kr. 9.000.
c) lýsingar, kr. 8.000.
d) ársritið, kr. 14.000.
e) stuðul til næmingaarbeiði í næmingafelagnum, kr. 2.500.
f) flytiútreiðslur hjá nýggjum lærarum, kr. 25.000.
g) umboðan, kr. 3.000.
h) evnisvika, kr. 8.000.
i) sum eitt nýtt tiltak undir hesi konto er ein umsókn um at fáa játtað kr. 20.000 um árið í 5 ár at seta í grunn við tí endamáli, at geva út eitt minnisrit í 1987, tá ið skúlin verður 50 ár. Vit meta, at furast má undir fyrireikingina nú, og lærararáðið hevur á fundi 3. sept. 1981 sett eina nevnd at taka sær av málinum. Nakað av peningi fer at verða nýtt so hvørt, men tað, ið eftir verður hvørt árið, er ætlanin at fáa sett í nevnda grunn.
j) Fyri 3 árum síðani varð eftir initiativi frá stjóranum fyri Mentaskólinn á Egils støðum tikin upp samvinna millum teir og okkara skúla. Nakrir næmingar hiðani (u. 15 í tali) vóru eina viku í Íslandi og sama tal av Islendingum kom henda vegin. Nevndi skúlastjóri (Vilhjálmur Einarsson) var aftur í seinasta skúlaári frammi við uppskoti um endurtøku av samvinnuni, men tá mátti eg bera meg undan, tí tann fyrra ferðin gjørdist nóg so kostnaðarmikil.

Søkt verður um kr. 15.000 til hetta endamál í 1982/83.

a) - j) tilsamans 113.500 kr.

Ad 2180 Leiguútreiðslur.

Ítróttahøllin á Hálsi, 12 t. um vikuna á 150 kr. = 1.800 kr. um vikuna. Í 40 vikur verður hetta kr. 72.000 + ein ítróttadag í 8 timar = kr. 1.200.

Vegna stórt næmingatal til prøvtøkurnar í 1982 verður í 3 av teimum skrivligu prøvtøkudøgunum ikki pláss fyri øllum í teimum hølunum, ið eru nýtilig til prøvtøkur (samkomuhøll og fimleikahøll). Tí verður neyðugt at leiga ítróttahøllina á Hálsi, sum kostar kr. 7.500 um dagin. Søkt verður um kr. 22.500 til hetta endamál + kr. 3.200 til flyting av borðum og stólum.

Tilsamans 98.900 kr.

LANDSVERKFRØÐINGURIN
Tinghúsvegi 7 . Postbox 72
3800 Tórshavn . Føroyar . Tlf. 11333

SKJAL 1

J. nr. 836/81 ÓMP/HD
(at tilskila í svari)

Tórshavn, 9. september 1981

Vísandi til bræv tykkara dagfest 2/9-1981 í sambandi við asfaltering av vegastrekkinum Hoydalsá oman til skúlan í Hoydølum, skulu vit siga frá, at omanfyrinevnda arbeiði kann gerast fyri o.u. 150.000 kr.

Við heilsan
Óli H. Petersen

Føroya Studentaskúli
Hoydalar
3800 Tórshavn.

FØROYA STUDENTASKÚLI
Hoydalar
Rektor

SKJAL 2

Tórshavn 2/9-1981.

Landsverkfrøðingurin,
Tórshavn.

Við tað at vegurin frá brúnni um Hoydalsá oman til skúlan í Hoydølum er í sera ringum standi og hevur asfaltering fyri neyðini, loyvi eg mær at heita á Landsverkfrøðingin at gera eina útrokning av, hvat ein tílík asfaltering kann fara at kosta. Vegurin hoyrir undir einum landsstovni, men er helst tó ikki landsvegur, heldur »privatvegur« hjá stovninum, og viðlíkahaldið verður tí helst at figgjast yvir figgjarætlan stovnsins, sum skal verða gjørd nú í næstum.

Við heilsan,
Arnbjørn Mortensen

Hoydalar. SKJAL 3

Tænastumenn:	**Føst løn**	**Yvirtíðarløn**
Rektari	241.989 kr.	0.0 kr.
Lektor	179.078 kr.	59.880 kr.
Lærari	149.304 kr.	93.600 kr.
Lærari	158.432 kr.	105.312 kr.
Skúlatænari	121.526 kr.	0.0 kr.
Tilsamans	850.329 kr.	258.792 kr.

Sáttmálaløn:	**Føst løn**	**Yvirtíð**	**landskassans partur uv eftirlønargjaldi 10 %**
Lektor	185.364	44.100	18.536
Adjunktur	147.684	45.432	14.768
—	124.536	78.468	12.453
—	119.748	60.528	11.975
—	83.616	72.096	8.362
—	107.424	84.000	10.742
—	131.292	107.820	13.129
—	133.404	162.672	13.340
—	114.060	18.408	11.406
—	119.928	0.0	11.993
—	88.404	62.016	8.840
—	172,176	19,152	17,218
—	76.656	12.720	7.666
—	143.016	19.908	14.302
—	124.536	55.788	12.454
—	114.060	43.404	11.406
—	107.112	43.356	10.711
—	157.080	91.200	15.708
—	31.560	28.272	3.156
—	107.652	53.544	10.765
—	99.876	115.284	9.988
—	129.096	10.776	12.910

—	114.060	61.956	11.406
—	65.628	66.612	6.563
—	32.700	5.964	3.270
—	129.096	53.688	12.910
—	114.060	20.652	11.406
—	65.352	48.240	6.535
—	124.524	121.836	12.452
—	143.016	94.992	14.302
—	151.164	103.248	15.116
—	118.968	80.832	11.897
—	156.012	81.396	15.601
—	185.364	55.752	18.536
—	185.364	49.560	18.536
—	152.484	39.264	15.248
Tilsamans	4.356.072	2.448.648	

Viðvíkjandi hækkingum, sí viðm. til konti 1004, 1040 og 1016.

Ad 1029 Timaløn. SKJAL 4

Timalærari	37.044
—	37.044
—	28.728
—	132.132
—	82.440
—	28.704
—	21.528
—	73.416
—	15.948
—	44.892
—	96.000
—	88.092
—	73.620
Tilsamans	759.588 kr.

Roknað verður við 10% prístalshækking pr. 1.4.1982 + 5% hækking í fíggjarárinum 1982/83; harafturat fritíðarløn 1,5%. Timalønir tilsamans kr. 884.920.

TRYGGINGARSTOVAN
Hoydalsvegur 6
Tlf. 1 5222

Tórshavn, tann 08.09.1081

FØROYA STUDENTASKÚLI
Hoydalar

Viðvíkjandi trygging av skúlabygninginum:

Vísandi til fund í dag saman við rektaranum og skúlatænaranum um trygging av skúlanum við útgerð til dagspris, so komu vit í felag til hesar upphæddir:

			Gjald
Skúlabygningur 3647 m² gólvvidd á kr. 5.500		20.000.000,-	kr. 20.000,00
+ partvís móti skaða av vatnleiðingsbroti upp til kr. 500.000,- (gjald uml. 2 0/00)			kr. 1.000,00
+ partvís móti skaða av stormi upp til kr. 1.000.000,- (gjald uml. 2 0/00)			kr. 2.000,00
Undirvísingar- og skúlaútgerð	E + V	3.500.000,-	kr. 5.250,00
Kantinuútgerð	E	120.000,-	kr. 120,00
Bókasavn	E + V	1.000.000,-	kr. 2.500,00
Skúlainnbúgv og útgerð á kostdeild í teimum nýgjørdu skúlastovunum	E	150.000,-	kr. 195,00
Samlað ársgjald frá 1/1-82			kr. 31.065,00
Um skúlin vil hava tryggingarnar settar í gildi nú beinanvegin, so má roknast við einum gjaldi uppá 1/2 av 31.000,-			kr. 15.500,00
— at afturflyta av trygging nr. 33470			kr. 3.750,00
At gjalda aftrat í tykkara figgjarári			kr. 11.750,00

Um tit bíða við at gjalda hetta til aftaná 1/4-82 verður neyðugt hjá tykkum at seta kr. 43.000,- av til bygningstryggingar á komandi játtan og síðani um 31.000,- umframt aðrar tryggingar.

Vænti at frætta nærri frá tykkum.

Vinarlig heilsan
sign.

Uppskot til fíggjarætlan fyri raksturin av
kostdeild Føroya Studentaskúla og HF-skeið fíggjarárið 1982/83.
Rakstrarstað **2225.**

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
		(1000 kr.)	(1000 kr.)	(1000 kr.)
780 Leiguinntøkur	— 50.164,08	— 35.0	— 46.0	— 46.0
792 Næmingagjald	— 276.360,00	— 320.0	— 258.0	— 258.0
1014 Løn/starvsfólk	0,00	0.0	155.0	155.0
1022 Løn/reingerð	169.602,00	175.0	130.0	130.0
1028 Løn/onnur	886.040,26	1.170.0	1.200.0	1.200.0
2110 El, hiti og vask	188.439,03	180.0	217.3	217.3
2305 Innbúgv	19.741,25	30.0	30.0	30.0
2335 Telefon	4.603,90	7.0	6.0	6.0
2510 Kostur	— 39.302,22	— 190.0	— 200.0	— 200.0
2530 Amboð	25.530,58	30.0	35.0	35.0
2531 Umsiting	210.440,38	190.0	170.0	170.0
2590 Aðrar útreiðslur	78.398,37	50.0	90.0	90.0
2225	1.216.969,47	1.287.0	1.529.3	1.529.3

Viðmerkingar.

Ad 780 Leiguinntøkur.

Fastar inntøkur umf. kr. 36.000. Inntøkur av útleigan í summarfrítíðini um kr. 10.000.

Av hesi útleigan um summarið hevur higartil mest staðist slit á húsini, útreiðslur til vask av seingjarklæðum, ampi og stríð hjá skúlatænarum o.ø., trupulleikar við at fáa sett húsini í stand til komandi skúlaár og lítlar og ongar inntøkur. Her eigur broyting at koma í.

Ad 792 Næmingagjald.

Í uppskotinum er róknað við kr. 6.000 í gjaldi fyri hvønn næming árliga ímóti kr. 5.000 fyri fíggjarárið 1981/82.

Á kostdeildini í Hoydølum er nú bert pláss fyri 43 næmingum ímóti fyrr 65. Roknað er við 10 mánaðum.

Her eru ymsir leysir endar. Skulu teir næmingar, sum eventuelt koma at búgva í húsunum Hoydalsvegur 1, roknast kostnæmingar, og verða eventuel onnur hús

leigað til næmingar at búgva í. Skulu hesir næmingar gjalda til kostdeildina í Hoydølum?

Ad 1014 Løn/Starvsfólk.

Lønin hjá kokkinum, sum fyrr hevur verið bókað á konto 1028 Løn/onnur, verður flutt á hesa konto.

Ad 1022 Løn/reingerð.

Upphæddin á hesi konto verður lægri enn fyrr, av tí at miðhæddin á kostdeildini er tikin til skúlastovur, og skúlin sostatt kemur at gjalda fyri at gera reint.

Ad 2110 El, hiti og vask.

Her er ikki roknað við møguligum útreiðslum til húsini, Hoydalsvegur 1.

Ad 2590 Aðrar útreiðslur.

Her verða bókaðar allar óvæntaðar útreiðslur og allar útreiðslur í sambandi við reinsan av rottangum, burturkoyring av øllum óruddi, bæði frá kostdeildini og skúlanum. Her er eisini gomul skuld — kr. uml. 40.000, við tað at rokningar fyri renovatiónskoyring vanliga koma ógvuliga seint inn.

Her verða eisini bókaðar útreiðslur í sambandi við friðkan av umhvørvinum, nýplanting o.a. Hækkingar eru gjørdar fyri vanligan lønar- og prisvøkstur.

Verða onnur hús løgd undir kostdeildina í Hoydølum t.d. Hoydalsvegur 1, eigur at verða hugsað um útreiðslur, ið standast av reingerð, upphiting el o.a.

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn, 23. september 1980
Telf. 11080 . Telex 11235 . Postbox 64

SKJAL. 1.

JP/IS

Vísandi til skriv Studentaskúlans dagfest 28. mai 1980, har søkt verður um cykajátan uppá kr. **34.480,00** fyri fíggjarárið **1980/81**, rakstrarstað **2225/2590: Aðrar útreiðslur**, skal verða sagt frá, at landsstýrið og fíggjarnevndin hava samtykt at ganga umsóknini á møti.

L.v.
Johan Djurhuus

Føroya Studentaskúli
Kostdeildin
3800 Hoydalar

Figgjaruppskot fyri figgjarárið 1982/83 fyri
Føroya Sjómansskúla, **2230**

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
1004 Løn/tænastumenn	831.761	871.000	997.000	997.000
1012 Løn/lærarar	663.527	747.300	894.000	894.000
1014 Løn/starvsfólk	130.522	176.700	189.000	189.000
1022 Løn/reingerð	207.739	200.000	257.000	257.000
1028 Løn/onnur	293.360	280.100	250.000	250.000
1040 Útlíðarlønir	427.187	502.500	558.000	558.000
1120 Ferða- og dagpeningur	27.477	10.000	40.000	40.000
2110 El, hiti og vask	97.248	115.000	135.000	135.000
2150 Umsitingar	50.032	60.000	90.000	90.000
2170 Ognartryggingar	10.039	14.000	20.000	20.000
2305 Innbúgv	5.225	20.000	25.000	25.000
2335 Telefon og telex	13.440	15.000	20.000	20.000
2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur	32.336	28.400	40.000	40.000
2530 Amboð	92.565	100.000	200.000	200.000
2590 Aðrar útreiðslur	13.269	30.000	35.000	35.000
2597 Eldsløkking	65.353	75.000	90.000	90.000
2230	2.961.080	3.245.000	3.840.000	3.840.000

Almennar viðmerkingar til uppskot Føroya Sjómansskúla.

Í uppskotinum frá Føroya Sjómansskúla er kr. 4.975.000 til nýbygging við skúlan roknað við. Av tí at Landsskúlafyrisitingin metir, at hetta eigur ikki at verða blandað saman við rakstrarfiggjatætlanina, er áðurnevnda upphædd ikki tikin við í figgjarlógaruppskotið.

Landsskúlafyrisitingin fer á øðrum sinni vegna Føroya Sjómansskúla at venda aftur til hetta byggimál.

Ad 1004 Løn/tænastumenn.

Stjóri	197.860
Varastjóri	173.530
1 sjómansskúlalærari	163.100
— —	144.625
— —	163.100
— —	139.100
1 1/2 fritíðarløn	15.000
Hædd fyri pristalshækking (10%)	100.585
Tilsamans	997.000

Petur Christiansen var ikki við á seinasta figgjarlógaruppskoti, hann var tó við á broytingaruppskoti, sum vit sendu 3. mars 1981. Hetta broytingaruppskot var tó ikki tikið til eftirtektar.

Ad 1012 Løn/lærarar.

1 sjómansskúlalærari	144.625
— —	139.100
— —	139.100
— —	129.000
— —	124.500
— —	124.500
1 1/2 í fritíðarløn	12.200
Hædd fyri pristalshækking (10%)	80.975
Tilsamans	894.000

Vit hava sett 1 lærara eyka uppá. Hetta er lærari, ið neyðugt verður at seta, um okkara uppskot at senda okkara lærarar á eftirútbúgving út at sigla verður góðkent.

Ad 1014 Løn/starvsfólk.

Skúlatænari	114.000
1/2 starvsfólk	55.000
1 1/2 % fritíðarløn	2.600
Hædd fyri pristalshækking (10%)	17.500
Tilsamans	189.000

Ad 1022 Løn/reingerð.

5 reingerðarfólk (á kr. 41.000)	205.000
1 1/2 % fritíðarløn	3.075
Høvuðsreingerð	25.000
Hædd fyri pristalshækking (10%)	23.925
Tilsamans	257.000

Ad 1028 Løn/onnur.

1 tímalærari (sjórætt)	87.600
1 -- (heilsulæra)	51.000
Fritíðarløn 9 1/2 %	13.400
Vikarløn (vegna sjúku, eyka útb. hjá lærarum)	
eykaskeið	75.000
Hædd fyri pristalshækking (10%)	23.000
Tilsamans	250.000

Ad 1040 Úrtíðarløsnir.

Úrtíðarløsnir	500.000
1 1/2 % fritíðarløn	7.500
Hædd fyri pristalshækking (10%)	50.500
Tilsamans	558.000

Ad 2530 Amboð.

Til viðlikahald, smávegis endurnýggjan, umvæling av instrumentum og tólum	200.000

Ad 2597 Eldsløkking.

Eldsløkking	90.000

Hetta eru útreiðslur til eldsløkkingarskeið, læknakanningar og annað í hesum sambandi.

Ad Tilbygningar.

Tekningar og útrokningar av kostnaðinum vórðu sendar landsstýrinum várið 1979.

Ad Øllum.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingaruppskoti seinni, um umstøðurnar broytast munandi.

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1982/83 fyri Klaksvíkar Sjómannaskúla. 2240.

Konto (1000 kr.)	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
780 Leiguinntøkur	— 4.2	— 4.2	— 4.2	— 4.2
1004 Løn/tænastumenn	165.4	180.0	196.0	196.0
1012 Løn/lærarar	249.2	440.0	440.0	440.0
1014 Løn/starvsfólk	0.0	5.0	5.0	5.0
1015 Løn/avloysarar	0.0	40.0	40.0	40.0
1022 Løn/reingerð	27.9	40.0	40.0	40.0
1028 Løn/onnur	16.2	32.0	20.0	20.0
1040 Løn/úrtíðarlønir	57.1	80.0	80.0	80.0
1050 Samsýningar	0.0	6.0	6.0	6.0
1105 Útiviðbót	0.0	10.0	10.0	10.0
1120 Ferða- og dagpeningur	3.7	10.0	10.0	10.0
2020 Prenting	1.3	8.0	5.0	5.0
2030 Lýsingar	0.2	6.0	5.0	5.0
2110 El, hiti og vask	34.2	40.0	40.0	40.0
2140 Umvælingar v.m.	5.8	20.0	25.0	25.0
2150 Umsitingar	0.0	20.0	25.0	25.0
2160 Húsaumbyggingar	0.0	0.0	?	?
2170 Tryggingar	5.0	7.0	7.0	7.0
2180 Leiguútreiðslur	65.0	90.0	90.0	90.0
2305 Innbúgv	0.0	25.0	25.0	25.0
2325 Postgjald	2.2	7.0	7.0	7.0
2335 Telefon og telex	4.7	7.0	7.0	7.0
2340 Leiga av maskinum	0.0	0.0	0.0	0.0
2350 Sakkøn hjálp	0.0	0.0	2.0	2.0
2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur	4.3	9.2	9.2	9.2
2507 Ekskursiónir	5.0	10.0	20.0	20.0
2508 Bókakeyp og innbinding	8.8	17.0	10.0	10.0
2510 Kostur	— 13.7	85.0	85.0	85.0
2530 Amboð	46.8	150.0	90.0	90.0
2590 Aðrar útreiðslur	7.0	50.0	60.0	60.0
2240	691.9	1.390.0	1.355.0	1.355.0

Sbrt. skriv dagf. 26. sept. 1981 frá Klaksvíkar Sjómansskúla:

Hjálagt senda vit uppskot skúlans til fíggjarløgtingslóg 1982/83. Biðið verður um kr. 1.355.000,-.

Ad § 14-2250: Føroya Fólkaháskúli:

Studningur til fólkaháskúlan verður veittur eftir løgtingslóg nr. 101/78. Harumframt fær Føroya Fólkaháskúli studning frá Tórshavnar Kommunu.

Hinar útreiðslurnar verða goldnar við næmingagjøldum, skeiðgjøldum v.m.

Landskassin letur 100% til leiðaraløn, 50% til frálærutilfar og innbúgv, og allur annar studningur til skúlan verður veittur við 70%.

Føroya Fólkaháskúli.

Konto	**Roknskapur 1980/81**	**Játtan 1981/82**	**Uppskot 1982/83**
1055 Eftirløn	156.000	219.000	167.000
3111 Fólkaháskúlin rentustudningur	60.000	60.000	60.000
3705 Næmingastudningur	280.000	280.000	336.000
3710 Rakstrarstudningur	724.000	653.000	755.000
Samlaðar útreiðslur	1.470.000	1.548.000	1.593.000

Harav Landskassans partur:

R: 1.220.000 J: 1.268.000 U: 1.318.000

Landskassans partur er av konto 1055 70%, av konto 3111 og 3705 100 %, av konto 3710 er Landskassans partur R: 724.000 J: 653.000 U: 755.000.

2255 Húsarhaldsskúlar.

Fíggjarætlan 1982/83

Matur	48.250,00 kr.
Skúlaleiðarin	153.050,55 kr.
Leiga av undirvísingarhølum	75.600,00 kr.
Olja	51.950,00 kr.

Ravmagn	21.600,00 kr.
Hjálpilærarar	43.200,00 kr.
Viðlíkahald	44.770,00 kr.
Telefon	4.900,00 kr.
Skrivstovuútreiðslur v.m.	12.700,00 kr.
Tryggingar	4.500,00 kr.
Renta	41.400,00 kr.
Ymist	4.300,00 kr.
Tilsamans	506.220,55 kr.

Føroya Landsstýri at gjalda:

Leiga av undirvísingarhølum	75.600,00 kr.
Olja	51.950,00 kr.
Ravmagn	21.600,00 kr.
Hjálpilærarar	43.200,00 kr.
Viðlíkahald	44.770,00 kr.
Telefon	4.900,00 kr.
Skrivstovuútreiðslur v.m.	12.700,00 kr.
Tryggingar	4.500,00 kr.
Renta	41.400,00 kr.
Ymist	4.300,00 kr.
Tilsamans	304.920,00 kr.

70% av	304.920,00 kr.	213.444,00 kr.
Skúlaleiðarin		153.050,55 kr.
Eftirstøða sambært roknskap 1980		156.230,90 kr.
		522.725,45 kr.

2255 Húsarhaldsskúlar.

Studningur til Klaksvíkar Húsarhaldsskúla verður veittur eftir løgtingslóg nr. 47/76. Hesin er í 3 ára skeiðinum 1979/80 - 1981/82 umleið 70 - 80% av øllum útreiðslunum.

Landskassin gevur ikki studning til mat, men ber allar útreiðslur til løn skúlaleiðarans og 70% av øðrum útreiðslum.

Landskassans partur:

R: 435 J: 328 U: 523

Ad § 14-2260 Kvøldskúlar.

Figgjarlógaruppskot fyri 1982/83 fyri kvøldskúlarnar.

Í 1000 kr.		Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
2260	Kvøldskúlar	3.141	4.600	5.175	5.175
				+ 173	+ 173

Ad 2260 Kvøldskúlar.

Á hesa konto er sett bæði studningur úr ríkis- og landskassa til kvøldskúlarnar eftir tí higartil galdandi lóggávu. Ríkis- og landskassin endurrindar kommununum 70% av útreiðslunum til læraralønir og ferðaútreiðslur fyri lærarar í tí vavi, slikur flutningur er neyðugur. Av studninginum til kommunurnar letur ríkið 2/3 og landið 1/3.

Í uppskotinum fyri figgjarárið 1981/82 varð mett, at lisna tímatalið fór at verða umleið 30.000 og kostnaðurin umleið 4,6 mill. kr.

Av tí at Landsskúlafyrisitingin, í størri mun, enn fyrr var møguligt, vil verða nakað afturhaldandi við at loyva stovnssetan av flokkum, og at góðkenna lærugreinir, sum verandi studningsheimilaðar, verður roknað við, at tímatalið fyri skúlaárið 1981/82 fer at verða umleið 30.000 tímar.

Samlaðu útreiðslurnar til kvøldskúlan í 1981/82 verða mettar at vera 5,4 mill. kr. Játtanin fyri figgjarárið 1981/82, 4,6 mill. kr. er hækkað við 12,5%, harav skulu kommunurnar gjalda 30% ella 1,6 mill. kr. Íroknað tær 5,4 mill. kr. er læraralønir til 1500 tímar á Lista- og handverkaraskúlanum á Sandi.

Omanfyri nevnda meting er gjørd við støði í núgaldandi lóggávu, og tí er ikki tikin við ein møgulig hækking, ið er at vænta, um so er, at fritiðarlógin verður nútímansgjørd eftir teimum stevnumiðum, sum nevnd eru í rammulógini um fritíðarundirvísing v.m. + 1500 tímar fyri Lista- og Handverkaraskúlan á Sandi = + 173.000 kr.

Partur Landskassans verður eftir hesum:

R: 743.000 J: 1.088.000 U: 1.365.000

Ad 2285 Skúlin á Trøðni.
Ríkið rindar 75% av útreiðslunum og landið 25%. Landskassans útreiðslur í 3 ára skeiðnum verður í 1000 kr.

Roknskapur	Játtan	Uppskot
1.780	1.786	2.112

Ad 3141 Laudsskúlafyrisitingin at ráða yvir.
Ríkiskassin rindar 50% av útreiðslum á hesi konto.

Landskassans partur:

Í 1000 kr.	Roknskapur	Játtan	Uppskot
	16	17	17

Viðmerkingar til konti hvørs útreiðslur landskassin ikki lutteknr í.

Føroya Læraraskúli.
Allar útreiðslur til læraraskúlan verða goldnar av ríkiskassanum.

Tekniskir skúlar.
Henda konto fevnir um Tekniska skúlan í Tórshavn og skúlaheimið hjá hesum skúla og somuleiðis Tekniska skúlan í Klaksvík og skúlaheimið hjá honum.

Undirvísingarmálaráðið, direktoratet for erhvervsuddannelserne, hevur higartil sitið fyri hesum skúlum. Útreiðslurnar til skúlarnar verða bornar sambært reglunum í fyriskipan nr. 518, dagfest 23. september 1977. Ríkið rindar 50% í rakstrarstudningi til lærlingaundirvísingina og kommunurnar 20%. Ríkið rindar 100% í studningi til prøvtøkuundirvísingina.

Av teimum samlaðu útreiðslunum rindar ríki o.u. 85%, kommunurnar o.u. 10%.

Tað, ið eftir er, o.u. 5%, verður fyrst og fremst rindað sum uppihaldsútreiðslur fyri lærlingar.

Landskassin veitir ikki studning til teir teknisku skúlarnar.

Handilsskúlar.
Hesin skúlin fær studning eftir somu reglum sum teknisku skúlarnir, og útreiðslurnar verða deildar á sama hátt.

Landskassin veitir ikki studning til handilsskúlan.

Føroya Maskinskúli.

Ríkiskassin ber allar útreiðslur.

Privatir skúlar.

Teir privatu skúlarnir fáa sambært figgjarnevndarinnar avgerð 1952 studning frá ríkinum uppá 85% av læraralønunum. Harumframt veitir Tórshavnar Kommuna eitt minni tilskot. Studningur verður ikki veittur úr landskassanum.

Aðrar útreiðslur verða goldnar við næmingagjaldi og tilskoti frá privatum.

Ad § 14-2290/3112: Ítróttasamband Føroya (Í.S.F.)

Smbrt. skriv dagfest 9. oktober 1981:

Umsókn til figgjarlógina.

Hjálagt senda vit figgjarætlanir fyri sersambondini, deildirnar og felagsraksturin hjá Í.S.F.

Út frá hesum figgjarætlanum sæst, at eginfiggjanin er uppá kr. 703.200,00, og at studningstørvurin er uppá *kr. 2.012.300,00.* Henda tørv vilja vit søkja háttvirda landsstýri og løgting um at veita okkum.

Tørvurin á stuðli hevur ongantíð verið so stórur sum í ár, og kemst tað m.a. av:

hækking í ferða- og upphaldsútreiðslum,
stórum aktiviteti uttanlands í komandi figgjarári,
meirútreiðslur til uppíbyggjanina av Í.S.F. húsinum
Judo Samband Føroya er eitt nýtt samband undir Í.S.F.

Hjálagt senda vit ein bókling, sum inniheldur Í.S.F. organisatiónina og øll ítróttar feløgini í Føroyum. Upplýsast skal, at tað eru 78 feløg og 8053 virkandi limir í Í.S.F. í løtuni.

Vónandi verður tikið væl undir við hesum uppskoti hjá okkum, men eru ivaspurningar, eru vit altíð til reiðar at samráðast um hetta.

Figgjarætlan fyri Í.S.F. fyri árið 1982/83.

INNTØKUR	
Landskassastudningur	kr. 2.012.300
Útvarp Føroya	kr. 50.000
A/S Danair	kr. 50.000
Føroya Banki	kr. 5.000
Limagjald	kr. 70.000

Fótbóltssamband Føroya	kr. 237.000	
Hondbóltssamband Føroya	kr. 100.000	
Svimjisamband Føroya	kr. 13.000	
Flogbóltssamband Føroya	kr. 100.100	
Fimleikasamband Føroya	kr. 14.000	
Róðrasamband Føroya	kr. 6.000	
Borðtennissamband Føroya	kr. 10.000	
Badmintonsamband Føroya	kr. 37.000	
Judosamband Føroya	kr. 6.100	kr. 528.200
Inntøkur ialt		kr. 2.715.500

ÚTREIÐSLUR

Felagsrakstur	kr. 520.000	
Fótbóltssamband Føroya	kr. 467.000	
Hondbóltssamband Føroya	kr. 870.000	
Svimjisamband Føroya	kr. 49.800	
Flogbóltssamband Føroya	kr. 280.100	
Fimleikasamband Føroya	kr. 90.500	
Róðrasamband Føroya	kr. 74.000	
Borðtennissamband Føroya	kr. 110.000	
Badmintonsamband Føroya	kr. 99.000	
Ítróttasamband fyri Brekað	kr. 62.000	
Ungdóms- og menningardeildin	kr. 60.000	
Judosamband Føroya	kr. 33.100	kr. 2.715.500

Viðmerkingar frá landsstýrinum:

2290/3112: Studningur til ÍSF.
Landsstýrið skjýtur upp at veita 1.000.000,00 kr.
Skjølini eru til taks á landsskrivstovuni.
2290/3113: Studningur til ferðir innanoyggja.
Landsstýrið skjýtur upp at veita 450.000,00 kr.

Ad § 2295/3115: Grunnur til lærdan lestur.

§ 2295 31.15 Grunnur til lærdan lestur

Vit mugu ásanna, at tess fleiri umsóknir verða sendar til Grunnin til lærdan lestur, tess minni verður til tann einstaka. Ella við øðrum orðum: tað, at fleiri og fleiri føroyingar fara at lesa, hevur við sær, at figgjarliga støðan hjá ti einstaka versnar.

Hetta er ein ótolandi støða, sum bøtt eigur at verða uppá.

Vit meta, at fyri at tann einstakið skal hava nakra nyttu burturúr hesum *láni*, so eru kr. 4.000 minstamark.

220 umsøkjarar á kr. 4.000 ..... kr.880.000,-

— — — — — —

Landsstýrið skjýtur upp at veita kr. 880.000,00.

Ad § 14-2295/3130 Ítróttar- og skúlabyggigrunnur.

Viðmerkingar til hesa konto eru á síðu 132

Landsstýrið skjýtur upp at játta 10.500.000 kr.
av hesum eru 5,5 milj. kr. tiknar við undir § 41 lántøku.

Ad § 14-2295/3135: Næmingastudningur til listamenn.

Smbrt. skriv dagfest 29. september 1981:

.....

Listafelagið skjýtur upp, at studningurin eins og í verandi fíggjarlóg verður settur til *30.000 kr.*

— — — — - - —

Landsstýrið skjýtur upp at veita kr. 30.000,00.

Ad § 14-2295/3137: Meginfelag Føroyskra Studenta.

§ 2295 31.37 Meginfelag Føroyskra Studenta

1. Rakstur

Sum lesast kann av rakstrarroknskapinum fyri árið 1980/81, er aktivitetsurin í Meginfelagnum øktur munandi.

Meginfelagstíðindi verður regluliga útgivið við hartil hoyrandi porto (25% av inntøkuni frá Føroya Landsstýri).

Sum hjálp til umsiting er sett skrivstovufólk. Útreiðslurnar til hetta verða kr. 4.500,-.

Skipað varð í summar fyri Studentatingi í studentaskúlanum í Hoydølum, har limirnir í MFS gjørdu status, bæði hvat MFS og limunum viðvíkur.

Samtykt er annars at geva pisuna út komandi ár, og kemur hon væntandi at kosta kr. 11.500,-.

Figgjarætlan fyri roknskaparárið 1981/82.

Inntøkur

Føroya Landsstýri	kr. 25.000	
Limagjald	kr. 8.000	kr. 33.000

Útreiðslur

Skrivstovuútreiðslur	kr. 25.000	
Fundir	kr. 1.900	
Porto	kr. 3.700	
Húsaleiga	kr. 14.000	
Lýsingar	kr. 6.000	
Pisan (600 eintøk)	kr. 11.500	
Millumtjóðaarbeiði	kr. 7.500	
Pisuskeið	kr. 7.000	kr. 76.600
Rakstrarhall		kr. 43.600

Figgjarætlan fyri roknskaparárið 1982/83.

Inntøkur

Limagjald	kr. 8.000	kr. 8.000

Útreiðslur

Skrivstovuútreiðslur	kr. 17.000
Fundir	kr. 3.000
Porto	kr. 4.000
Húsaleiga	kr. 14.000
Lýsingar	kr. 4.000
Pisan	kr. 11.500
Millumtjóðaarbeiði	kr. 5.000
Pisuskeið	kr. 7.000

Ferðaskrivarar	kr. 5.000	
Studentating	kr. 8.000	
Fundir í Árhus og Odense	kr. 2.000	kr. 80.500
Rakstrarhall		kr. 72,500

Sum tað sæst av figgjarætlanini, kemur felagið at hava brúk fyri umleið kr. 70.000 í roknskaparárinum 1982/83. Hesin vøkstur stavar frá vaksandi aktiviteti og av prishækkingum.

2. Studningur til stytri lestrarferðir.

Talið av umsøkjarum veksur støðugt, og ferðaútreiðslurnar eru hækkandi. Studulin til tann einstaka er í mesta lagi kr. 1.500 til lestrarferðir til Føroya, annars í mesta lagi kr. 1.200, ella tað sama sum í 1978.

Tað, at talið av umsøkjarum økist hevur við sær, at studningsorkan minkar burtur. Fylgjurnar av hesum eru, at antin sær tann eitstaki umsøkjarin minni pening, ella at Heiri umsøkjarum verður noktaður stuðul.

Fyri at sleppa undan hesum heita vit á Landsstýri um at økja stuðulin frá kr. 20.000 til kr. 40.000.

Uppskot Meginfelagsins til lestrarlán

§ 2295 31.5 220 × 4.000 ..... kr. 880.000

Uppskot Meginfelagsins til rakstur og til stytri lestrarferðir

§ 2295 31.37 ..... kr. 112.500

— — — — — —

Viðmerkingar frá landsstýrinum:

§ 14-2295/3137 Meginfelag føroyskra studenta.

Landsstýrið skjýtur upp at veita 113.000 kr.

Roknskapurin er til skjals á landsskrivstovuni.

Ad § 14-2295/3138: Norrøna Felagið í Føroyum.

Smbrt. skriv dagfest 5. november 1981:

Uppskot til løgtingsfiggjarlóg 1982/83 viðvikjandi norrøna Felagnum í Føroyum, rakstrarstað § 14-2290/3138:

Biðið verður um, at studningurin til felagið fyri komandi figgjarár verður settur til *kr. 25.000,-* ímóti kr. 20.000,- í ár.

Grannskoðaður roknskapur varð í mars í ár sendur landsskrivstovuni.

Landsstýrið skjýtur upp at veita kr. 25.000,-.

Ad § 15-2310 Føroya Landsbókasavn.

Sbrt. skriv dagfest 28. oktober 1981:

Eftir áheitan Landsstýrisins verður niðan fyri standandi uppskot til figgjarætlan fyri 1982/83 hjá Føroya Landsbókusavni sent landsstýrinum við neyðturviligum viðmerkingum og upplýsingum.

2310 Føroya Landsbókasavn

Konto	Tekstur	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
1004	Løn/tænastumenn	173.3	170.4	189.0	189.0
1014	Løn/starvsfólk	584.7	876.7	1.030.6	1.030.6
1016	Løn/sáttmálalønt	222.0	205.0	230.9	230.9
1022	Løn/reingerð	65.0	91.2	90.0	90.0
1028	Løn/onnur	153.0	70.0	75.0	75.0
1305	Fólkatrygging	2.8	2.5	3.0	3.0
2110	El, varmi og vask	100.1	123.0	200.5	200.5
2150	Umsitingar	13.1	10.0	13.0	13.0
2170	Ognartrygging	22.3	26.0	26.0	26.0
2240	Flutningur	9.6	8.0	8.0	8.0
2305	Innbúgv	13.7	10.0	35.0	35.0
2315	Prenthutir	16.0	15.0	16.0	16.0
2325	Postgjald	10.9	11.5	13.0	13.0
2335	Telefon og telex	16.5	15.0	20.0	20.0
A. Deildarleiðari (løn pr. 1. juli 1981 + 5 dýrtíðarviðbøtur og íroknað leiðaraviðbót kr. 25.620 og eftirlønargjald 10%)	175	175	195,8
B. Bakteriolog á bakteriologisk/hygiejnisku deildini	150	»ja«	195,0
C. Kemikari á miljø/kemi deildina	150	0	175,0
D. Eftirlitsmann á løggildings- og eftirlitsdeildina	—	—	175,0
	525	575	740,8

Spurningurin um sáttmálasett fólk má viðgerast saman við landsstýrinum og figgjarnevndini.

Eftirlitsmaðurin skal standa fyri løggildings- og eftirlitsdeildini og m.a. í samráð við Vrakarastovuni skipa fyri meira regluligum heilsufrøðiligum eftirliti og taka av prøvum á flakavirkjum og skipum v.m.

1028 Ymiskt/onnur

Søkt verður um eina hækking uppá 10.000 kr. Vist verður til rokniskapin pr. 30.09.81, sum vísti 9.406 kr. (94%).

Kontoin verður nýtt til ymsar útreiðslur í samband við eftirlit og taka av prøvum og tímalønta uppvaskihjálp.

1040 Útlíðarlønir

Søkt verður aftur um 5000 kr. Sum nevnt fyrr, kann verða neyðugt at fóla er á Starvsstovuni í tíma hvønn leygardag og sunnudag.

1120 Ferða- og dagpeningur

2030 Lýsingur

2325 Postgjald

Søkt verður um eina hækking uppá 1000 kr. til 5.000 kr.

2335 Telefon og telex

Søkt verður um eina hækking uppá 2000 kr. til 26.000 kr. Rokniskapurin pr. 30.9.81 vísir, at telefonútreiðslurnar eru komnar upp á kr. 13.966 (58%).

2350 Sakkøn hjálp

Eingin peningur er nýttur í samband við sakkøna hjálp enn. Vit søkja aftur í ár um 10.000 kr. og nevna samtíðis, at skulu vit hava møguleika at fáa sakkøna hjálp uttanifrá, er neyðugt við minst 10.000 kr. Søkt verður sostatt um 10.000 kr. við

alternativum 0,0. Spurningurin er, um Starvsstovan skal hava **møguleika** at fáa sakkøna hjálp skjótt, tá á stendur.

2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur
Óbroytt.

2508 Bókakeyp og innbinding
Søkt verður um eina hækking uppá 2000 kr. til 26.000 kr. Týdningurin at hava eitt gott stovnsbókasavn má ikki undirmetast. Einans tíðarritini (íroknað abstracts) kosta uml. 12-13.000 kr. Fakbøkur eru dýrar, í meðal 250 kr./stk. 25-30 fakbøkur + neyðugt tíðarrit má sigast at vera avgjørt minstamark fyri tørvi okkara.

2530 Amboð
Í 1980/81 vóru einans 27.500 kr. nýttar av teimum 125.000 játtaðu kr. Tvingarsamt er um tær 125.000 kr. í hesum figgjarárinum verða nýttar. Søkt verður um 160.000 kr., sum er ein hækking uppá 35.000 kr.

2537 Rannsóknir
Søkt verður aftur í ár um 50.000 kr. til ymiskar royndir.

2590 Aðrar útreiðslur
Óbroytt.

2592 Tænastuakfør
Óbroytt.

2593 Laboratoriurakstur
Søkt verður um eina hækking uppá kr. 50.000. Víst verður til roknskapin, sum pr. 30.9.81 vísti, at 112.260 kr. vóru nýttar av teimum 130.000 kr. (86%) og annars roknskapin 1980/81 (121%).

Viðmerking frá landsstýrinum:

Ad konto 1014 Løn/starvsfólk (E):
Landsstýrið tekur ikki undir við setan av 1 laboranti afturat hálvan dag kr. 65.000,-.

Ad konto 1016 Løn/sáttmálalønt (B), (C) og (D):
Landsstýrið tekur ikki undir við at seta afturat:

(B) Bakteriolog	195,0
(C) Kemikara	175,0
(D) Eftirlitsmann	175,0
	545,0

Ad § 15-2390/3201: Barnabløð.
1) Sbrt. skriv dagfest 10. oktober 1981:

Rakstrarroknskapur
fyri »Barnatíðindi« 1980.

Inntøkur:

Lýsingar, blaðhald, søla	kr. 7.655
Løgtingsstudningur	kr. 5.000
	kr. 12.655

Útreiðslur:

Prenting, tilfarsrit o.a.	kr. 3.800
Postgjald, box	kr. 920
Telefon	kr. 900
Ljós, hiti, reingerðing	kr. 1.800
Annað	kr. 200
Samsýning	kr. 5.035
	kr. 12.655

Ókeypis eintøk verða send teimum lýsandi.
Ókeypis eintøk verða send skúlabørnum.
Ókeypis eintøk verða send sjúkrahúsum.
Haldarar: 200, ársgjald: kr. 20,-.

2) Smbrt. skriv dagfest 8. oktober 1981:

Konto	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83
§ 15-2390/3201 Barnabløð	15.000	35.000

Vísandi til landsstyrisskrí[illegible] nr. 400 — 31[illegible] fari eg vegna
Bókadeild[illegible] lesing til Barna- & ungdómsblaðið

Hetta tal er [illegible] hevur [illegible] tørtil hava fingið játtað til hetta endamál, og kemur tað av, at vit nú endiliga eru kommin so langt, at vit hava fingið ein blaðstjóra at taka sær av ungdomsstarvinum. Blaðið er tí gjørt nakað størri, og er tað sera torført at fáa tað at bera seg, hetta [illegible] verulegt. Men vit halda tað hava størsta týdning, at nakað verður skrivað til tey 13-17 ára gomlu. Higartil hava tey verið við sviðið soð.

Tí vóna vit, at tað fer at bera til at [illegible] okkum hesa umsókn.

Viðmerking fra landsstýrinum.

Roknskapur fyri Barna- [illegible] viðmerkingarnar til skjals 4 landsskrivstovuni.

[illegible]

Játtanarfeløg [illegible] játtanarupphædd á [illegible] 148 200 kr. á landskassanum fyri fíggjarárið 1982'83, sbrt. fíggjarætlan felagsins fyri 1982, sum er tøgal við ber saman við grannskoðaðu roknskapirnar fyri tíðina 1. mai til 31. december 1980.

Roknskaparárið hjá felagnum er almanakkárið.

Sum nevnt í fylgiskrivi okkara til seinastu umsókn frá 28.12.1980 hava vit sannað, at brúk hevur verið fyri hesum landsumfatandi áhugaleikfelagi, sum nú hevur 7 limafeløg.

Felagið veitir limafeløgunum og øðrum áhugaðum ráð og leiðbeiningar, eins og fíggjarligur stuðul verður latin ungfólki serliga, ið hug hevur at leita sær útbúgving og kunnleika um leiklist, tá høvi bjóðst. Skipað verður fyri skeiðum og fundum. Roynt verður eisini at birva liv í aftur sjónleikarfeløg, sum ikki hava verið virkin seinastu árini. Onnur feløg — ungmannafeløg, bygdarfeløg o.s.fr. — sum eisini fáast við sjónleik, eru velkomin sum limir.

Fyri 1981/82 søkti MáF um 125.000 kr. í landskassastuðningi og fekk tilsøgn um 50.000 kr. Við hesi skerdu fíggjarætlan varð heldur ikki í ár gjørligt at fáa tann í viðtøkunum kravda umsitingarstjóran settan til at stýra og samskipa virki felagsins. Felagið søkir ti aftur í ár um stuðul til at løna einum dugandi fólki í hesum starvi, sum er neyðugt, um felagsskapurin skal virka eftir ætlan.

Vit vóna um velvild og góða undirtøku omkring hetta inn hesa umsókn um stuðulin fyri 1982 upp á 148.200 krónur.

Fíggjarætlan MáF - fyri 1982

Inntøkur:

1. Limagjald	2.800
2. Stuðul frá Nordisk Amatørteaterråd	3.000
3. Stuðul frá Føroya Landsstýri	148.200
Tilsamans	154.000

Útreiðslur:

4. Løn	63.000
5. Stuðul til leikfeløg og einstaklingar	40.000
6. Skeiðvirksemi hjá MáF	20.000
7. Fundarútreiðslur	13.000
8. Útvegan av leikritum	4.500
9. Skrivstovuhald	5.000
10. Telefon, porto, lýsingar	5.500
11. Ymist	3.000
Tilsamans	154.000

Ad. 4 Í felagsviðtøkunum krevst, at umsitingarstjóri skal hava um hendi dagligu leiðslu felagsins.

Ad. 5 MáF letur stuðul til einstøku leikfeløgini og til einstaklingar, ið leita burtur at fáa sær útbúgving innan leiklist og sum kunna søkja um stuðul frá MáF. Higartil í 1981 hava 4.700 kr. verið latnar 7 fólkum og einum felagi. Ætlanin er eisini at veita feløgunum stuðul til leikuppsetingar v.m.

Ad. 6 Luttakarafeløgini rinda sjálvi ein part og luttøkugjald verður uppkravt.

Ad. 7 Her uppi í útreiðslur til aðalfundin í NAR, sum verður í Finnlandi í 1982.

Ad. 11 Her uppi í limagjald til NAR, umf. 400 kr.

Sjónleikarabólkurin GRÍMA

Viðv. figgjarætlan 1982/83.

Við hesum verður søkt um, at peningurin, sum játtaður er á figgjarløgtingslógini til sjónleik verður hækkaður, soleiðis at sjónleikur yvirhøvur kann fáa betur umstøður at virka í.

Søkt verður um, at Grima fær hækkað sín stuðul frá 100.000 kr. til *200.000 kr.*

Sum orsøk til ynski um hækkanina á figgjarætlanini, kann visast á, at Grima vegna figgjarligar trupulleikar í 1979 repaði seglini, soleiðis at tá bert vóru tvey fólk í føstum starvi hjá Grimu. Í leikárinum 1980/81 og 1981/82 hava vit partvist havt eitt fólk afturat, men eru í løtuni bert 2 1/2 fólk í føstum starvi. Hetta meta vit er ov lítið fyri at kunna nøkta tann tørv, ið er innan sjónleikaraarbeiði. Ynski okkara er framvegis aftur at kunna halda upprunaligu manningina í Grímu, nevniliga 5 fólk, ið starvast fulla tíð alt árið. Fyri at hetta kann gerast møguligt er neyðugt við einari vissari figgjarligari trygd, serliga nú tað hevur vist seg, aftaná at sjónvarpið fór undir at senda regluliga, at tað ikki er møguligt hjá okkum at spæla inn tað nógva av peningi, umframt tað at útreiðslurnar við hvørjari sýning eru rættiliga stórar (í høllisleigu og lýsingar. Sjálvt um umstøðurnar sum so hesi tvey seinastu árini eru nógv broyttar, visir seg framvegis stórur og vaksandi áhugi fyri sjónleikaraarbeiðinum, og verður nógv tíð nýtt til tiltøk, sum t.d. kvøldsetur og annað, sum vit ikki fáa nakran pening fyri, men kortini meta at hava stóran týdning fyri mentanararbeiði okkara framvvir, fyri at skapa áhuga og venju fyri, at vit sjálvi eiga at geva mentan okkara innihald og ikki lata okkum taka av fótum av ti ovurhondfs stóra árini, ið kemur inn á okkum uttanífrá.

Tann játtaði peningurin hevur, áðrenn Grima var stovnað, verið nýttur til sjónleikararáðgevaravirksemi. Hetta ráðgevaravirksemi hevur Grima røkt síðan august 1977 og røkir framvegis.

Víst verður í hesum sambandi til umsóknir okkara undir tykkara jnr. 225-16,7.

Roknskapur fyri leikárið 1979/80 verður viðlagdur.

Í leikárinum 1981/82 verður virksemi røkt av 2 1/2 settum fólki, og hava vit sum árini frammanundan sett okkum hesa arbeiðsætlan:

I: GRÍMA í framtíðini: Aðaltáttarin í hesum máli er sum nevnt frammanfyri, at virka fyri, at Grima aftur kann fáa **økta** manning, t.v.s. minst 5 fólk, ið virka fulla tíð. Hetta gerst bert við einum munandi betri figgjarligum støði. Her vóna vit, at Landsstýri og Løgting vísa okkum vælvild við at neyðugur stuðul verður latin.

Í endamálsgrein okkara hava vit m.a. sett okkum hesi mál:

1. Við egnum virksemi og saman við øðrum at fremja enn størri áhuga og viðurkenning fyri sjónleiki sum listarligt málbragd.
2. Sjálvsúrbúgving.
3. Almennar framførslur.

4. At stuðla sjónleikarafeløgum, skúlum og øðrum áhugabólkum við ymiskum tiltøkum, t.d. skeiðum og leikuppseting. At vegleiða í sjónleikamálum yvirhøvur.
5. At skapa rúmari samband ímillum fólk og sjónleik, — og list sum heild.
6. Sum aðaltált vilja vit sýna leiklist, ið hevur beinleiðis tilknýti til tað føroyska samfelagið fyrr og nú.
7. Dentur verður lagdur á at røkka um allar Føroyar, herundir útoyggjar og smábygdir, sum sjónleikir higartil ikki beinleiðis hevur borið við.

Tað er eyðsæð, at hesi mál ikki til fulnar eru ella kunna røkkast við teim umstøðum, sum í løtuni verður arbeitt undir, men partvíst verður í dagliga arbeiðið okkara nomið við øll málini, sum hevur givið úrslit í einum mentum sjónleikaraarbeiði í Føroyum, sum neyðugt skuldi farið fyri skjeyti vegna væntandi fíggjarligan stuðul.

II. Leikarbeiði:

»**Haturfuglar**« eftir Arthur Miller varð uppafturtikin frá seinasta leikári, men noyddust vit at gevast aftaná fáar framførslur, orsakað av, at høvuðsleikarin fór til skips. Leikurin er tó ikki niðurlagdur fyri gott, men er ætlanin at taka hann uppaftur í vetur og halda fram við at ferðast við honum um bygdirnar. »Haturfuglar« varð annars framførdur við luttøku av 15 fólkum uttanífrá, umframt ta verandi manningina í Grímu.

»**Skógardrongurin**« eftir Christinu Andersson er heitið á ævintýrleiki fyri børn og vaksin, sum Grima í løtuni framførir. Eisini til hendan leik høvdu vit fólk uttanífrá at spæla við, nevniliga skógardrongin sjálvan. Skógardrongurhevur higartil fingið góða undirtøku, men enn er ov tíðliga at siga, hvussu hann kemur at roynast, men um sløtta tíð verður eisini farið at ferðast við leikinum, umframt at skúlarnir hava víst seg áhugaðar fyri leikinum.

»**Nýggjur leikur**«: Arbeitt verður eisini støðugt við at finna nýggjar leikir. Men fyri at kunna gera meira rímuliga planlegging av hesum, er neyðugt hjá okkum at vita, hvørja hjálp vit kunnu væntað, tá ringt er at finna leikir til so fá fólk, sum vit eru í Grímu í løtuni.

Barnabókasavnið: Vitjan á barnabókasavninum er í vetrarhálvárinum vorðin fastur táttur í arbeiðinum hjá Grímu, sum vit vóna at kunna halda fram við, tá tað altíð hevur verið gjørt ov lítið á sjónleikaøkinum fyri aldursbólkin undir skúlaaldur.

Kvøldsetur-o.a.: Gríma sum heild og einkultu Grímu-limirnir luttaka javnan í kvøldsetum og tiltøkum, sum feløg, bólkar og einstaklingar skipa fyri. Her royna vit at luttaka, sum stundir og møguleikar eru.

III. Leikuppseting:

Í løtuni verður arbeitt við leikuppseting fyri Havnar Sjónleikarafelag, Klaksvíkar Sjónleikarafelag og Eydnuna á Oyrarbakka.

IV. Skeiðvirksemi:

Í samarbeiði við Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla skipar Grima aftur í ár fyri drama- og sjónleikaskeiði, og eru í løtuni 4 bólkar innteknaðir.

V. Vegleiðing:

Húsateknisk vegleiðing: Í samband við byggjan og broytan av sjónleikahølum eru vit til reiðar at veita hjálp og vegleiðing til innrættan og keyp av hóskandi útgerð. Til hetta hava vit royndir og tilfar frá undanfarnu árunum at røkja hesa uppgávu.

Leikteknisk vegleiðing: Til hesa uppgávu, sum vit meta mest kemur at snúgva seg um at veita »hjálp til sjálvhjálp« hava vit eisini royndirnar frá undanfarnu árunum at byggja á.

Sum framgongur av frammanfyristandandi, eru nógvar uppgávur at røkja, og sjálvt um samsýningar og løn verður veitt okkum fyri ymiskar av uppgávunum, so samsvarar hetta sjálvdan við tað arbeiði og tíð, ið er fyri neyðini.

Uppgávurnar seta vit okkum tó fyri at røkja aftur í ár, í bestu vón um, at Landsstýri og Løgting veitir okkum vælvild, so at okkum framvegis verður lív lagað sum sjónleikabólkur.

Roknskapurin er til skjals á Landsskrivstovuni.

Ad § 15-2390/3205: Til útgávu av barnabókum.

Sambrt. skriv dagfest 8. oktober 1981:

Konto	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
§ 15-2390-3205 til útgávu av barnabókum	350.000,-	500.000,-	500.000,-

Vísandi til skriv tykkara dagsett 21.09.81 — F.L. j. nr. 400 — 3169 — fari eg vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags at søkja um stuðning at geva út barna- og ungdómsbøkur fyri

kr. 500.000,-

Ásannandi landsins fíggjarstøðu hava vit seinastu árini einans hækkað umsókn okkara eitt sindur, svarandi nøkurlunda til inflatiónina — men í ár loyva vit okkum

at gera eitt undantak, m.a. ti at forlagið í ár er fylt 25 ár; og ti at nevndin hevur avgjørt at fara undir útgávu av ungdómsbókum, sum ógvuliga stórt trot er á, og sum krevja munandi større iløgur enn vanligar barnabøkur.

Vit vóna, at táð fer at bera til at játta økkum hesa umsókn.

Að § 15-2390/3206: Føroya Listasavn.

Smbrt. skriv dagfest 5. oktober 1981:

Umsókn um játtan á figgjarløgtingslóg fyri 1982/83

Umvæling av Listaskálanum

Listaskálin varð tikin í nýtslu í 1970. Tá nøkur fá ár vóru liðin, var eyðsæð, at bygningurin hevði mong álvarsom brek, fyrst av øllum var sera umfatandi leki. Roynt hevur verið at bøta og umvæla sum ráðini hava verið til, men til lítla nyttu. Í seinastuni hevur lekin tikið dik á seg, soleiðis at partar av húsinum eru beinleiðis ónýtiligir og annað toilettið noyddust vit at steingja, ti tað stendur undir í vatni, tá ið avfall er.

Nú er um at koma hóttafall á, húsið er ikki vakurt longur, og nevnd skálans sær ongan annan veg enn at søkja um **játtan á figgjarløgtingslógini til at seta bygningin aftur í stand.**

Hjálagt: Notat frá Arnsteini Niclasen og Peturi Olsen verkfrøðingum um Listaskálan, nov. 1980.

Í hesum notati verður eldsvandin nevndur, ið stendst av, at allur bygningurin er bjálvaður við flamingo og klæddur við hessian og viði. Í kostnaðarætlanini, ið her er sett upp, hava vit í staðin hugsað okkum at varðveita hesa konstruktión innan og minka um eldsvandan við einum Halon-anleggi til eldsløkking.

1. Tilboð frá Tórshavnar Skipasmiðju.

2. Tilboð frá Dansk Lukningsenterprise A/S og Dansk Velux A/S um nýgerð av vindeygum og ihndekningum í tekjuni, prísur 11.

3. Kostnaðarætlan frá Landsbyggifelagnum viðvíkjandi ymiskum bjálvingar-klæðingar- og øðrum umvælingar- og endurnýggingararbeiði.

1.	207.500 kr.	
2.	117.560	
	9.690	
3.	653.560	988.310 kr.

Viðmerkjast skal, at tørvur hevði verið á umsókn til neyðuga øking av skálanum. Í fyrsta lagi átti nýggj goymsla at verið bygd. Goymlsan er alt ov trong, hon er fýrrúm og vaskirúm samstundis og á ongan hátt nóg trygg fyri tað miljónavirði í peningi hjá Listasavninum, ið har verður goymt. Í øðrum lagi átti Listaskálin at verið dupult so stórur. Sum heild er hann ov lítil til at kunna hýsa tí tjóðarsavni Føroya, hann átti at gjørt. Tær virðismiklu myndirnar, ið Føroya Almenna Listasavn eigur, og sum hava innivist í Listaskálanum, tola ikki, og eru í fleiri førum skaddar av at verða tiknar niður og hongdar upp í heilum, hvørja ferð ein nýggj serframsýningarrøð byrjar.

Men hendan umsókn umfatar bara umvæling og nýgerð av verandi húsum, sum eru í so ringum standi, at tey illa eru nýtandi, og í núverandi líki ikki til nakran heiður fyri tjóðina.

Viðvíkjandi tí tátti í fíggjarlógini, ið umfatar studning til rakstur av Listaskálanum.

Skotið verður upp, at játtanin, eins og í verandi fíggjarári, verður sett til 130.000 kr.

Viðmerking frá landsstýrinum.

Landsstýrið skjýtur upp at veita kr. 1.118.310,-. (Tað er 3. kr. 988.310 + kr. 130.000).

Roknskapurin frá Listaskálanum er til skjals á Landsskrivstovuni.

Að § 15-2390/3211: Skúlabókaútgáva.

Smbrt. skriv dagfest 29. september 1981:

Fyri Føroya Skúlabókagrunn skal eg, eftir at nevndin hevur kannað um tær útreiðslur, ið ætlandi koma at verða fíggjarárið 1982/83, heita á landsstýrið um at seta á fíggjarløgtingslógina sum studningsveitan **kr. 800.000,00.**

Hjálagt verður sent landsstýrinum:

1. Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1982/83.
2. Roknskapur fyri 1980/81.
3. Yvirlit yvir bøkur, Føroya Skúlabókagrunnur átti á goymslu hjá BMS 1. apríl 1981.
4. Yvirlit yvir útkomnar bøkur 1981.
5. Yvirlit yvir handrit, ið arbeitt verður við.

Yvirlit yvir væntaudi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1982/83.

1. Renta av kassakreditti í Føroya Sparikassa	kr.	12.000,00
2. Leiga av hølum	kr.	15.000,00
3. Innbúgv	kr.	15.000,00
4. Fundarpeningur, Ijós, lýsingar o.a.m.	kr.	15.000,00
5. Vikarsamsýningar	kr.	33.000,00
6. Løn til skrivstovufólk og aðrar skrivstovuútreiðslur	kr.	230.000,00
7. Telefon v.m.	kr.	6.000,00
8. Til bókaútgávu	kr.	800.000,00
9. Niðurskurður av millumrokning við landskassan	kr.	200.000,00
	kr.	1.326.000,00
Ætlaður peningur fyri bókasølu 1982/83	kr.	526.000,00
	kr.	800.000,00

ad. 2. Føroya Skúlabókagrunnur hevur alla sína tíð havt ókeypis innivist hjá formanninum. Seinasta ár var neyðugt at leiga sjálvstøðugt høli í býnum.

ad. 3. Alt skrivstovuarbeiði hjá grunninum hevur higartil verið røkt av formanninum og við leysari skrivstovuhjálp av og á. Seinasta ár var neyðugt at seta 1 1/2 skrivstovufólk, tí arbeiðið er støðugt vaksandi. Í samband við hetta var eisini neyðugt at keypa nakað av innbúgvi.

ad. 5. Fyri at geva lærarum stundir til at avgreiða endaligt handrit, hevur verið neyðugt í nøkrum førum at gjalda løn til vikar fyri rithøvundan. Hetta gjald verður so roknað sum partur av samsýning fyri arbeiðið.

ad. 6. Vísandi til skriv landsstýrisins til grunnin í september í ár viðvíkjandi løn til skrivstovufólk skal upplýsast, at hesar útreiðslur — 1 skrivstovufólk í 12. lønarfl., 5. stig, 1/2 skrivstovufólk í 9. lønarfl., 11. stig, kassameistari og formaður — pr. juli 1981 umroknaðar til árligar útreiðslur og hækkaðar við 12 1/2 % verða 230.000 kr.
Tessvegna, at lønartalvur og lønarsáttmálar til gjølligari útrokning ikki eru til laks enn, verða hesar útrokningar gjørdar á omanfyrinevnda grundarlagi.

ad. 8. Til sjálva bókaútgávuna 1982/83 er grunnurin noyddur at hækka studningin av tí, at ráðið fyri ferðslutrygd hevur heitt á grunnin um at geva út eitt bókarað, sum ætlandi fer upp um tær 370.000,00 kr., og sum fer at binda ein part av peninginum fyrstu árini.

So statt søkir grunnurin um eina samlaða upphædd í figgjarløgtingslógini 1982/83 uppá 800.000,00 kr., sum er 200.000,00 kr. meiri enn játtanin árið frammanundan, tá ið grunnurin fekk 132.000,00 kr. minni enn tað, hann søkti um.

Viðmerking frá landsstýrinum

Landsstýrið skjýtur upp at veita kr. 700,000,00.

Roknskapurin er til skjals á Landsskrivstovuni.

Ad § 15-2390/3216: Bókamiðsølan.

Smbrt. skriv dagfest 29. september 1981:

	Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83
Innt.	Sølugjald 10%	58.547,39		60.000,00
	Studningur frá landskassanum	220.000,00	220.000,00	275.000,00
	Rentur av innistandandi	7.679,27		7.000,00
Útr.	Lønir	133.578,00		157.000,00
	Húsaleiga	90.698,40		120.634,00
	Skrivstovuútreiðslur	4.973,25		7.000,00
	Prislistar og bókamerkir	0,00		6.500,00
	Koyring, farmagjald og porto	7.344,55		10.000,00
	Trygging	9.722,00		11.000,00
	Revisión	5.700,00		8.000,00
	Telefon	1.497,00		2.000,00
	Húsaútreiðslur	6.818,50		8.000,00
	Prentlutir	21.435,12		0,00
	Ymiskt	1.975,01		2.000,00
	Rakstraravlop áðrenn avskriving	2.584,83		4.866,00
	Avskrivað uppá innbúgv	4.700,00		10.000,00
	Ársúrslit	2.115,17		134,00

Viðmerkjast skal at Bókamiðsølan í juni 1980 hevur keypt eina bókhaldsmaskinu fyri kr. 30.000,-.

Viðmerking frá landsstýrinum.

Landsstýrið skjýtur upp at veita kr. 220.000,00.

Roknskapurin er til skjals á Landsskrivstovuni.

Ad § 15-2390/3217: Orðabókaútgávu.

Smbrt. skriv dagfest 6. oktober 1981:

Umsókn um játtan á figgjarløgtingslógini 1982/83

Føroya Fróðskaparfelag loyvir sær við hesum at søkja um eina játtan á figgjarløgtingslógini 1982/83 upp á kr. **75.000,00** í grunnin til útgávu av orðabókum (grunnur nr. 6625).

Á figgjarløgtingslógini 1980/81, par. 15-2390/3217, vóru játtaðar kr. 88.000 til orðabókaútgávu, harav kr. 80.000 fóru til at afturrinda eitt lán frá 1978 til útgávuna av Donsku-føroysku og Føroysku-donsku orðabókini, samstundis sum 8.000 kr. kundu fara í landskassagrunnin, sum onga játtan hevði fingið síðan 1974/75. Á figgjarløgtingslógini **1981/82** eru játtaðar kr. 75.000 í grunnin.

Orðabókasamarbeiðið millum Føroya landsstýri og Føroya Fróðskaparfelag gongur aftur til 1958/59, tá ið landsstýrið beyð sær til at útvega pening til handritagerð og prenting av nýútgávu av Føroysku-donsku orðabókini eftir M.A. Jacobsen og Chr. Matras, og umframt figgjarlógarjáttan útvegaði munandi stuðul frá føroyskum peninga- og handilsstovnum.

Treytin fyri hesum studningi var, at allur **ávtopspeningur frá søluni** av orðabókum (og -listum), sum felagið gav út, skuldi fara óskerdur í ein orðabókagrunn (stovnaður longu 1959) til at stuðla **handritagerð** — men ikki prenting — av føroyskum orðabókum.

Landskassagrunnurin til útgávu av orðabókum hevur verið til síðan 1959/60. Her er at siga, at peningastovnarnir, sergrunnar eins og privatar fyritøkur hava verið scna-lagalig at veitt stuðul. Landskassagrunnurin má tó sigast at hava verið høvuðsálitið til **figging av útgávukostnaðinum** av teim orðabókum og -listum, Fróðskaparfelagið hevur givið út 1960-77.

Umframt ískoytinum í 2. útgávu av Donsku-føroysku orðabókini hevur hesi seinastu árini verið arbeitt við handritum til triggjar orðabøkur: enska-føroyska, føroyska-enska, føroyska-norska (arbeiðið heilt ella lutvist figgjað av Orðabókagrunninum). Tann, sum liggur fyrst fyri at koma út, er enska-føroyska orðabókin. Skal Fróðskaparfelagið yvirhøvur gera sær vónir um innan fyri t.d. eitt 2 ára skeið at fara undir útgávuna — sum við núgaldandi prísum neyvan kostar minni enn

175.000-225.000 kr. — er altumráðandi at fáa munandi figgjarlógarjáttan í landskassagrunnin, har í løtuni góðar 83.000 kr. eru tøkar.

Konto		Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
15-2390/3217:	Orðabókaútgáva, í grunn (grunnur nr. 6625)	88.000*	75.000**	75.000	75.000

*) Nýtsla: 80.000 kr.
í grunn 8.000 kr.

**) Í grunn: 75.000 kr.

Ad § 15-2930/3230 Landsstýrinum at ráða yvir.

Landsstýrið skjýtur upp, at settar verða av kr. 165.000,-, herav kr. 15.000,- til Blásastovu í Gøtu.

Ad § 16-2401: Vrakarastovnurin.

Sambært skriv frá fiskivinnustovuni dagfest 30. oktober 1981.

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
1004 Tænastumenn 1)	1.083.000	1.029.250	1.260.000	1.260.000
1015 Avloysarar	61,000	92.000	98.000	98.000
1120 Ferða- og dagpeningur	84.000	126.500	140.000	140.000
2120 Leiguútreiðslur	21.000	32.200	35.000	35.000
2325 Postgjald	600	2.300	3.000	3.000
2335 Telefon v.m.	18.000	28.750	30.000	30.000
2356 Aðrar útreiðslur	7.400	0		
— 1) Elektronisk málitól			55.000	55.000
— 2) Skeiðvirksemi			45.000	45.000
— 3) Tænastubilurin			20.000	20.000
	1.275.000	1.311.000	1.686.000	1.686.000

1) yvirvrakari
+ 8 vrakieftirlitsmenn

Ad § 16-2410: Nautiskt royndarkamar.

Sambært skriv dagfest 12. oktober 1981:

Heiti.	Roknskapur 1980/81	Játtað 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
Samsýning	6.600,00	6.600,00	6.600,00	6.600,00
Rakstrarútreiðslur	4.084,28	5.000,00	5.000,00	5.000,00
Viðlíkahald av reiðskapi v.m.	251,50	5.000,00	25.000,00	25.000,00
prógvgjald	1.220,00	1.000,00	1.200,00	1.200,00
Tilsamans	9.715,78	15.600,00	35.400,00	35.400,00

NB. Undir viðlíkahald er tikið við kr. 20.000,- í sambandi við keyp av fotosellutóli til máting av ljósmegi á lanternum. Hetta tól verður nýtt í grannalondum okkara, og kemst hetta av, at tað eru komnar strangari reglur til máting av lanternum eftir teimum nýggju sjóreglunum.

Ad § 16-2420: Sjómansheim.

Sambært skriv dagfest 5. juli 1981 frá bygginevndini.

Byggjnevndin fyri føroysku sjómansheimið í Reykjavik, leggur inn umsókn til háttvirda Landsstýri um peningastuðul í fíggjarárinum 1982-1983 til byggingar áframhald av sjómansheiminum.

Byggjnevndin takkar fyri munandi veittan stuðul undanfarin ár og vónar at Landsstýrið framvegis fíggjarliga er ført fyri at stuðla okkum áfram.

Nú vinna vit við at ganga frá húsinum á uttan og fáa sett glas í so langt peningur rekkur, nógv av hesum er sjálvboðavinna.

.....

Sambært skriv dagfest 16. oktober 1981 frá Hini føroysku sjómansmissiónini.

Við hesum loyva vit okkum at søkja um at fáa studning á løgtingsfíggjarlógini 1982/83 viðvíkjandi rakstrarstaði § 16-2420:

kr. 80.000,00 til sjómansheimið Livd í Føroyingahavnini
kr. 10.500,00 til arbeiðið í Reykjavik, Lerwick og frá komandi ári í Hirtshals.

Hetta er sama upphædd, sum vit hava fingið í fleiri ár, og sum vit eru sera takksamir fyri at fáa, tí annars høvdu vit ikki kunnað gjørt hetta arbeiðið millum sjómenn okkara í fremmandum havnum.

Av tí at vit ikki hava kunnað góðtikið vissar útreiðslur til viðlikahald av húsinum í Grønlandi seinasta ár, fáa vit ikki givið tykkum endaliga uppgerð fyri raksturin av húsinum, men verður hetta sent tykkum rættuliga skjótt.

. . . . . .

Viðmerking frá landsstýrinum:

Hin føroyska sjómansmissiónin	90.500 kr.
Bygging av sjómannsheimi í Reykjavík	40.000 kr.
Kirkjuliga missiónsfelagið	10.500 kr.
	140.000 kr.

Að § 16-2430: Vaktar- og bjargingartænastan.

Sambært skriv dagfest 6. oktober 1981.

Hjálagt verður sent uppskot til fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1982/83.

	Uppskot stovnsins	Uppskot landsstýrisins
Rakstrarstað 2430 Skrivstovan	kr. 1.453.000,00	— 147.000 kr.
Rakstrarstað 2431 »Tjaldrið«	kr. 6.880.500,00	6.580.000 kr.
Rakstrarstað 2433 »Óiavur Halgi«	kr. 6.627.500,00	6.347.500 kr.
	kr. 14.961.000,00	12.780.500 kr.

Fíggjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1982/83
Rakstrarstað 2430 skrivstovan.

kontonr./navn	Roknsk. 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
790/inntøkur	600.000,-			1.600.000
794/søla av sjókortum	1.350,-	0	0	0
1004/løn/tænastumenn	226.379,-	220.000	252.000	252.000
1014/løn/starvsfólk	158.704,93	245.000	180.000	180.000
1210/skeið	0	10.000	10.000	10.000

2021/prenting av sjókortum	20.732,-	0	0	0
2110/el-hiti-vask	0	30.000	40.000	40.000
2180/leigutútreiðslur	70.416,-	70.000	80.000	80.000
2305/innbúgv	36.105,80	20.000	10.000	10.000
2315/prentlutir	516,-	10.000	3.000	3.000
2335/telefon og telex	83.709,35	60.000	80.000	80.000
2533/leiga av Íorum	466.616,55	500.000	500.000	500.000
2590/aðrar útreiðslur	75.697,32	60.000	30.000	30.000
2596/aldumátari	101.732,24	125.000	125.000	125.000
2598/bjargingarfeløg	74.166,26	100.000	108.000	108.000
3315/veðurprogram	28.049,75	35.000	35.000	35.000
	741.475,20	1.485.000	1.453.000	— 147.000

Figgjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1982/83
Rakstrarstað 2431 »Tjaldrið«

Kontonr./navn	Roknsk. 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
790/inntøkur	72.435,00			
1014/løn-starvsfólk	2.593.227,90	3.013.000	3.120.500	3.120.500
1015/løn-avloysarar	220.702,65	240.000	250.000	50.000
1040/úrtíðarløn	3.261,05	40.000	25.000	25.000
1210/skeið	.0	20.000	20.000	20.000
2170/ognar-og-vanlukkutr.	286.972,75	310.000	315.000	315.000
2510/kostur, búnytt, vask.	88.199,61	200.000	255.000	255.000
2530/naut. amboð	101.068,94	65.000	65.000	65.000
2541/olja	1.063.261,71	1.900.000	2.300.000	2.200.000
2542/dekksútgerð	61.605,94	90.000	100.000	100.000
2543/maskinútgerð	151.700,14	130.000	160.000	160.000
2544/skipasmiðjuút.	2.389.751,62	300.000	200.000	200.000
2590/aðrar útreiðslur	116.074,50	120.000	70.000	70.000
	7.003.391,81	6.428.000	6.880.500	6.580.000

Figgjarætlan fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna 1982/83
Rakstrarstað 2433 »Ólavur Halgi«

kontonr./navn	Roknsk. 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
790/inntøkur	106.475,28			
1014/løn-starvsfólk	2.583.280,84	2.996.000	3.082.500	3.082.500
1015/løn-avloysarar	218.119,72	240.000	250.000	50.000
1040/úrtíðarløn	8.999,80	40.000	25.000	25.000
1210/skeið	1.276.80	20.000	20.000	20.000
2170/ognar-og vannlukkutr.	220.435,75	240.000	250.000	250.000
2510/kostur, búnyttur, vask.	202.039,33	200.000	255.000	255.000
2530/nav. amboð	104.854,45	60.000	65.000	65.000
2541/olja	1.417.595,20	1.400.000	1.900.000	1.800.000
2542/dekksútgerð	99.688,51	70.000	100.000	100.000
2543/maskinútgerð	465.218.01	100.000	180.000	180.000
2544/skipasmiðjuútr. v.m.	152.972,63	600.000	450.000	450.000
2590/aðrar útreiðslur	146.232,66	120.000	70.000	70.000
	5.514.238,42	6.086.000	6.647.500	6.347.500

Viðmerkingar til figgjarætlan hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Rakstrarstað 2430 Skrivstovan:

Konto 1014: er lækkað og kemst hetta av, at játtað var eitt skrivstovufólk afturat, men er starvið ikki sett.

Konto 2110: er hækkað samsvarandi vantandi útreiðslum.

Konto 2180: er hækkað, og kemst hetta av at leiguútreiðslurnar eru prístalsviðgjørdar.

Konto 2335: er hækkað, hetta kemst av vaksandi nýtslu av telex m.a. aldumátingum til Útvarpið og til Onglands.

Konto 2590: er lækkað, hetta kemst av, at nýtsla til el-hita-vask er komið á serstaka konto.

Aðrar hækkingar eru vanligar prishækkingar.

Rakstrarstað 2431 »Tjaldrið«

Konto 2510: er hækkað, hetta kemst av at útreiðslur til búnyttur og vaskitoy eru tiknar við á hesa kontoina.

Konto 2541: er hækkað, og kemst hetta av hækkandi oljuprísum.

Konto 2543: er hækkað orsakað av vaksandi útreiðslum til maskinútgerð.

Konto 2544: er lækkað av tí at Tjaldrið nýliga hevur fingið hevniðsumvæling.
Konto 2590: er lækkað, og kemst hetta av at búnyttur og vaskitoy er flutt til konto 2510.
Aðrar hækkingar eru vanligar príshækkingar.

Rakstrarstað 2433 »Ólavur Ilalgi«
Konto 2510: er hækkað, hetta kemst av at búnyttur og vaskitoy er tikið við á hesa kontoina, hækkanin kemst eisini av, at skipið hevur havt og kemur at hava skúlanæmingar við í starvspraktik, í 1981 verður talið av næmingum, sum hava verið umborð í praktik, umleið 45.
Konto 2541: er hækkað, og kemst hetta av vaksandi oljuprísum.
Konto 2543: er hækkað orsakað av vaksandi útreiðslum til maskinútgerð.
Konto 2544: er lækkað, men mett verður at skipið kemur fáa ymsar ábøtur.
Konto 2590: er lækkað, av tí at búnyttur og vaskitoy er flutt til konto 2510.
Aðrar hækkingar eru vanligar príshækkingar.

Viðmerkingar frá landsstýrinum:

Rakstrarstað 2430 Skrivstovan:

Metta inntøkan frá Tryggingarsambandinum 1,6 milj. kr. er roknað við undir rakstrarstað 2430 Skrivstovan.

Fyri skipini »Tjaldrið« og »Ólavur Halgi« er á konto 2541/olja

skorið niður við	100.000 kr.
og á konto 1015/løn-avloysarar við	200.000 kr.
tilsamans	300.000 kr. fyri hvørt

skipið við tí í huga, at lagt verður soleiðis til rættis, at feriurnar hjá manningini verða lagdar í samband við árliga skipasmiðjueftirlitið.

Ad § 16-2430: Vaktar og bjargingarskip.

Sambært skriv dagfest 26. august 1981:

Viðv. skrivi frá landsstýrinum j.nr. 816-12-1 dagf. 3. aug. 1981 um flytiliga sløkkiútgerð.

Vaktar- og Bjargingartænastan hevur saman við umboðum fyri Tórshavnar sløkkiliði kannað hetta mál, og eru vit samdir um niðanfyri standandi útgerð sum talan kann verða um:

1 stk. stór pumpa við el-start	kr. 39.750,00
1 stk. lítil pumpa	kr. 13.680,00
Slangur	kr. 4.104,00
Forgreinar + avgreinar	kr. 1.328,00

Strálirør	kr. 1.123,00
Tokustrálirør	kr. 548,00
Skúmrør	kr. 2.400,00
Forleingararør	kr. 200,00
Skúmblandara	kr. 1.340,00
Súgvuslanga	kr. 63,00
Skúmveska 100 kg. á kr. 8,00	kr. 800,00
Amboðstaska	kr. 850,00
Lyktir	kr. 390,00
Roykkavaraútgerð	kr. 20.000,00
Bjargingarlina	kr. 500,00
Containari til øll amboðini	kr. 10.000,00
	kr. 97.076,00
Tollur 20%	kr. 19.415,00
Frakt	kr. 4.000,00
	kr. 120.491,00

Hendan útgerð sum tað framgongur av tølunum kostar umleið kr. 120.000,00 og er totalvektin av allari útgerðini umleið 600 kg.

Upplýst er fyri okkum at helikoptarnir sum eru í Føroyum í dag hava lyftuorku: Tyrla 1.500 kg. og marinuhelikoptarin 700 kg. Báðir kunnu sostatt flyta alla útgerðina allar vegir.

Somuleiðis bleiv viðgjørt á hvønn hátt hesi amboð sktulu varðveitast, og komu vit til ta niðurstøðu, at best hevði verið um útgerðin var á brandstøðini í Tórshavn. Tó er tað soleiðis, at teir vegna plásstrot ikki í løtuni sóu sær møguleika fyri hesum, men varð upplýst, at teir høvdu eitt gamlan brandbil standandi sum ikki varð í nýtslu og ongantið aftur kom at vera nýttur. Um teir fingu loyvi at koyra bilin burtur, hava teir pláss fyri hesum amboðum.

Uppá hesi amboð er leveringstíðin ca. 3 mánaðir.

Viðmerking til § 16-2430:

Samlaða upphæddin á omanfyri nevndu konto er	12.780.500 kr.
afturat hesum kemur sløkkiútgerð, flytilig við helikoptura	120.491 kr.
tilsamans	12.900.991 kr.

Ad § 16-2440: Laksa- og sílaaling.

Sambært skriv frá P/F Fiskaaling dagfest 22. oktober 1981.

	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
	(1000 kr)	(1000 kr)	(1000 kr)	(1000 kr)
Laksa- og sílaaling	400	600	600	800

Viðmerkingar: Sum kunnugt er stór smoltstøð í gerð við Áir. Fyrsta byggistig er um at vera liðugt, og annað byggistig er undir projektering. Hetta krevur stórar íløgur. Raksturin hvílur í sær sjálvum, men eingin peningur er til royndir, og er tað sera óheppi fyri elna royndarstøð, ið vera skal.

Ad. § 16-2460: Fiskivinnuráðið.

	Roknskap. 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnslns 1982/83	Uppskot landsstýrislns 1982/83
1/2 Starvsfólk	8.055,00	40.000	40.000	40.000
Eykahjálp	0,00	20.000	30.000	30.000
Samsýningar til ráðslimir	47.772,00	90.000	100.000	100.000
Ferða- og dagpeningur	16.453,50	40.000	50.000	50.000
Telefon v.m.	2.259,67	2.000	3.000	3.000
	74.540,17	192.000	223.000	223.000

Ad § 16-2490: Minstaløn v.m.

Sambært skriv dagfest 15. oktober 1981.

Sbrt. skriv háttvirda landsstýrisins 7. september 1981, seta vit upp niðanfyri útreiðslurnar 1980/81:

Minstaløn	6.013.382,00
minstivinningur	810.583,00
prísískoyti til saltfisk	3.803.151,00
útróðrarstudningur	5.931.121,09

landingarstudningur, mynstraði skip	5.549.990,00
flakastudningur	272.782,00
jákupskeljastudningur	36.960,00
hemara- og svartkalvastudningur	197.216,00
idnaðarstudningur	6.529.595,00
agnstudningur	5.159.826,70
rakstrarstudningur	29.309.535,53
oljustudningur	30.965.109,84
fritíðarløn	1.276.544,00
studningur til ráfiskagrunnin	80.000.000,00
fyrisæti	1.237.882,50
rentuútreiðslur	774.308,30
avskriving uppá innbúgv	3.545,00
	177.871.531,96

Útgoldið frá 1. apríl til 30. september 1981:

Minstaløn	2.528.700,00
minstivinningur	404.594,00
prísíkoyti til saltfisk	1.554.879,00
hemara- og svartkalvastudningur	71.530,00
flakastudningur	166.819,00
útróðrarstudningur	1.849.864,70
rakstrarstudningur	18.158.572,50
landingarstudningur, mynstraði skip	2.816.802,00
fritíðarløn	1.268.069,00
brennioljustudningur	18.965.750,88
idnaðarstudningur	1.713.613,00
agnstudningur	2.393.736,45
studningur til ráfiskagrunnin	21.500.000,00
fyrisæti	678.411,38
rentuútreiðslur	260.207,26
	74.331.549,17

Ad § 17-2501: Landsdjóralæknaembætið.

Smbrt. skriv dagfest 5. oktober 1981:

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
1004 Løn/tænastumenn	237.040,41	237.9	249.5	249.5
1015 Løn/avloysari	0,00	0.0	0.0	0.0
1016 Løn/sáttmálaløn	165.007,03	164.4	203.0	203.0
1040 Úrtíðarløn	0,00	35.0	45.0	0.0
1120 Ferða- og dagpeningur	18.282,40	25.0	35.0	35.0
2180 Leiguútreiðslur	3.000,00	3.0	3.0	3.0
2325 Postgjald	0,00	1.0	1.0	1.0
2335 Telefon/telex	2.587,30	5.0	5.0	5.0
2590 Aðrar útreiðslur	2.421,50	10.7	11.0	11.0
	428.338,64	482.0	552.7	507.5

Viðmerkingar:

Ad. 1004: 1 landsdjóralækni

Ad. 1016: 1 hjálpardjóralækni, sáttmáli 162.0
eftirlønargjald 16.2
viðbót 25.0

Lagt er upp fyri eini aldursviðbót pr. 1. juli 1982 og væntaðari hækking fram til 31. mars 1983 í sama mun sum higartil.

Ad. 2590: Lýsingar, skrivstovulutir, prent, tíðarrit v.m.

Ad § 17-2504: Landbúnaðarráðgevarin.

Smbrt. skriv dagfest 2. oktober 1981:

Konto		Játtan 81/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
2504: Landbúnaðarráðgevarin				
1004: Løn			180.000	180.000
1022:				
2110: Leiga av høli, løn/reingerð el, hiti og vask			12.000	12.000
1120: Ferða- og dagpeningur	40.000			
søla av bili	10.000		30.000	30.000

2305: Innbúgv		3.000	3.000
2315: Prentlutir		3.000	3.000
2325: Postgjald		1.000	1.000
2335: Telefon og telex		6.000	6.000
2356: Aðrar skrivstovuútreiðslur		2.000	2.000
2590: Møgulig skeið og ferðing uttanlands		7.000	7.000
	207.000	244.000	244.000

Viðmerkingar:

2504: Lønarramma 20. - 24. - 29. - 31..

1022) Hesar útreiðslur vóru ikki við í seinastu játtan. Føroya Jarðarráð gav stovn-
2110) inum innivist seinasta vetur, og hevur borið útreiðslurnar av hesum. Spurningurin um gjald er ikki greiddur enn, og verða tí hesar útreiðslur settar upp.

1120: Tað er neyðugt við øðrum og í longdini bilígari bili, 3 ára kontrakt.

2305: Stovnurin hevur ikki neyðuga útgerð til skrivstovu- og annað arbeiði hjá hesum.

2315: Inn- og uttanlendis tíðarrit.

2325: — — —

2335: Somu viðm. sum undir 1022 og 2110.

2356: Her er meiri tonkt uppá onkrar útreiðslur, sum kunnu koma í hesum tíðarskeiðnum, t.d. prent av onkrari publikatión.

2590: Hetta er torført at meta um. Peningurin nýtist ikki at verða brúktur eitt árið og kanska heldur ikki í fleiri, og so okkurt árið hevði verið ynskiligt við størri upphædd.

Av tí at landsstýrið hevur eina kontu at ráða yvir innan landbúnaðin, var kanska frægari at tann upphæddin var tað størri, eftirsum ein álikavæl skal søkja landsstýrið um loyvi til uttanlandsørindi.

Samlaða uppskotið er sostatt kr. 37.000 størri enn játtanin fyri verandi fíggjarár. Størsti vøksturin (kr. 18.000) er endurgjald til Føroya Jarðarráð fyri høli, telefon v.m., og var henda upphædd ikki við í seinastu fíggjarlóg. Sjálvt um eitt endurgjald er avgjørt í skrivandi løtu, er órealistiskt at halda, at henda skipan fer at vera frameftir. Í skrivi millum stovnarnar stendur, at hesin spurningur um endurgjald skal tukast upp.

Að § 17-2505: Seyðaráðgevari og seyðaroyndir.

Smbrt. skriv dagfest 7. oktober 1981:
Uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri seyðaráðgevarin 1982-83.

Roknskapur 1980-81:		
Konto 1050 Samsýningar		40000,00 kr.
Konto 1120 Ferða- og dagpeningur		11699,00 kr.
Konto 2590 Aðrar útreiðslur:		
5 el-fáreklipper	11781,20 kr.	
Hegna, petar o.a. at stika ca. 40 ha. av undirhaga á Oyri	16664,05 kr.	
1 seyðavekt	3498,00 kr.	
Seyðaalistøðin, 2 brundseyðir	2000,00 kr.	
Seyðahúslán, Oyri — rentur og avdrag	12163,77 kr.	46107,02 kr.
útreiðslur í alt		97806,02 kr.
Útbetalt í roknskapsárinum 1980-81		95000,00 kr.
Yvirtrekk, flutt til næsta roknskapsár		2806,02 kr.

Játtan 1981-82.	
Konto 1050 Samsýningar	60000 kr.
Konto 1120 Ferða- og dagpeningur	10000 kr.
Konto 2590 Aðrar útreiðslur	45000 kr.
	115000 kr.

	Uppskot stovnsins 1982/83	**Uppskot landsstýrisins 1982/83**
Uppskot til 1982-83.		
Konto 1050 Samsýningar	66.000 kr.	60.000 kr.
Konto 1120 Ferða- og dagpeningur	14.000 kr.	14.000 kr.
Konto 2590 Aðrar útreiðslur	60.000 kr.	45.000 kr.
	140.000 kr.	119.000 kr.

Ad § 17-2510: Útskifting og matrikulstova.

Smbrt. skriv dagfest 13. oktober 1981:

. . . . . .

Rakstrarstað 2510 — konto 2694.	**Roknsk. 1980/81**	**Játtan 1981/82**	**Uppskot stovnsins 1982/83**	**Uppskot landsstýrisins 1982/83**
1004 løn tænastumenn	767.241	862.000	995.000	995.000
1014 løn starvsfólk	2.099.213	2.198.000	2.932.000	2.790.000
1022 løn reingerð	72.370	60.000	70.000	70.000
1028 løn bønafólk	46.074	50.000	100.000	100.000
1120 ferða- og dagpeningur	124.867	110.000	150.000	150.000
2180 leigufútreiðslur	175.100	200.000	260.000	260.000
2110 el-hiti og vask	28.161	25.000	30.000	30.000
2530 amboð - keyp - umsiting	149.173	140.000	150.000	150.000
2592 tænastuakfør	50.951	120.000	150.000	150.000
2512 tilfar - skrivst. - teknist.	71.605)			
2512 — uppmáling	30.096)	420.000	550.000	550.000
2512 — fotokopiering o.a.	112.305)			
2512 kortkonstr. - luftfoto	153.566)			
2325 postgjald	10.090	15.000	15.000	15.000
2335 telefon, lýsingar o.a.	41.056	35.000	40.000	40.000
2590 aðrar útreiðslur	46.433	40.000	60.000	60.000
790 — inntøkur	1.106.662	1.000.000	1.300.000	1.300.000
	2.871.639	3.275.000	4.202.000	4.060.000

Viðmerkingar til uppskotið.

Roknað er við hesi manning:

Tænastumenn:

stjóri	34. lønarrammu
1 landmálari	31. —
1 —	29. —
2 hjálparlandmálarar	20. —
1 —	10. —

Sáttmálaløn fólk:

1 landamálari — løntur eftir sáttmála fyri »Statsansatte landinspektører«.
3 landmálarar — løntir eftir sáttmála fyri sivilverkfrøðingar.
6 hjálparlandmálatar — løntir eftir sáttmála millum Landsstýrið og Teknikarafelagið.

1 næmingur — løntur eftir sama sáttmála (útbúgving lokin í figgjarár.).
4 teknarar — løntir eftir sama sáttmála.
1 bókhaldari — løntur eftir sáttmála millum Landsstýrið og Starvsmannafelagið.
1 skrivstovufulltrúi — løntur eftir sama sáttmála.
4 skrivstovufólk — løut eftir sama sáttmála.
1 fotokopiering v.m. — løntur eftir sama sáttmála.

Lønir:

Tænastumenn:

stjóri	kr.	208.228,-
landmálari 1	kr.	191.686,-
— 2	kr.	176.847,-
hjálparlandmálari 1	kr.	148.798,-
— 2	kr.	148.798,-
— 3	kr.	120.614,- (ikki sett)
	kr.	994.971,-

Starvsfólk:

landmálari 3	kr.	253.509,- (íroknað eftirløn)
4		201.458,- — —
— 5	kr.	156.644,- —
— 6	kr.	151.042,- —
Hjálparlandmálari 4	kr.	142.386,-
— 5	kr.	142.386,-
— 6	kr.	142.386,-
hjálparlandmálari 7	kr.	141.156,-
— 8	kr.	116.556,-
— 9	kr.	115.853,-
hjálparlandmálaranæmingur 1	kr.	89.618,-
teknari 1	kr.	67.791,- (arb. 1/2 dag)
2	kr.	135.581,-
3	kr.	118.902,-
— 4	kr.	115.711,-
bókhaldari 1	kr.	149.065,-
skrivstovufulltrúi 1	kr.	142.743,-
skrivstovufólk 1	kr.	132.228,-
— 2	kr.	66.114,- (arb. 1/2 dag)

—	3	kr. 113.552,-
—	4	kr. 114.095,
Forvarbeiði o.a. 1		kr. 123.703,-
		kr. 2.932.479,-
		tilsamans .... kr. 3.927.450,00

Hvat lønunum viðvíkur verður vist til leiðbeiningar landsstýrisins um uppskotið til fíggjarløgtingslogina 1982/83, og er roknað við somu lønum 1. juli 1981 við møguligum aldursviðbótum + 5 prosent + 5 pristalsviðbøtur.

1004 Tænastumannastarvið hjálparlandmálari (3) er normerað í 1971, men er ongantíð lýst leyst og sett, við tað at hetta liggur væl lægri enn hini tænastumannastørvini, og tað, tí hinir hjálparlandmálararnir taka eftir sattmála millum teknikarafelagið og landsstýrið.

1014 Í uppskotinum er roknað við tí fólki, sum arbeiðir við stovnin í dag, at settur verður 1 landmálari afturat, og at tveir næmingar, ið hava lagið sína útbúgving, eru settir í starv.

1022 Her verður vist til roknskapin 1980/81.

1028 Bønafólk verður mest nýtt í sambandi við marknasetingar, tá úrskiftingar eru loknar innangarðs, útreiðslurnar eru tí ójavnar ár um ár. Í hesum fíggjarárinum, verður marknasetingin á Eiði helst framd, og er hetta eitt stórt arbeiði.

Internationala samskipanin IAESTE, hevur seinastu árini biðið um, at Matrikulstovan tekur studentar, serliga verkfrøðingar við landmálingsútbúgving til praktiska uppvenjing, í 1 til 2 mánaðir um summarið. Tá hetta er tann tíðin, ið Matrikulstovan serliga hevur brúk fyri fólki til útiarbeiði, er roknað við 2 studentum komandi summar.

1120 Her verður vist til roknskapin 1980/81. Tá nýtar eru 125 tús. í ferða- og dagpeningi.

2180 Í fíggjarárinum 1980/81 eru leigaútreiðslurnar 175 tús., og er í uppskotinum roknað við at stovnurin fær størri høli, soleiðis sum avtalt hevur verið í skrivi til landsstýrið 27. febr., 7. mai og 8. sept. 1981.

Her verður vist á at Matrikulstovan flutti nú í hesi húsini í 1965. Talið á arbeiðsfólki, og serliga nøgdin av arbeiðstilfari og arbeiðstólum ger tað tíðarneyðugt at fáa betri arbeiðsumstøður.

2530 Her verður bókað innbúgv, skrivi- og roknimaskinur, og landmalingsinstrument, víst verður til roknskapin seinastu árini.

2592 Her verður víst á at játtanin fyri 1981/82 er 120 tús. (sbr. skriv landsstýrisins dagfest 10. juli 1981 F.L.j. nr. 315-15) og er í uppskotinum roknað við keypi av nýggjum bili.

2512 Í figgjarárinum 1981/82 eru játtaðar 420 tús. og er nýtslan pr. 1. okt. 233 tús. Í uppskotinum til seinastu figgjarlóg varð upplýst, at ætlanin var at fotografera ein ávísan part av landinum summarið 1981; men tey vánaligu veðurlikindini fordøðu fyri signalering og flúgving.

Kortlegging í 1:1000 til matrikulkort og útskiftingarkort umfatar nú tær flestu bygdirnar. Í summar eru ávistar bygdirnar Strendur, Selatrað og Oyndarfjørður, so at nú resta í bert 6 smærri bygdir. Talið á matrikulkortum er nú komið upp móti 600 og á tekniskum kortum millum 900 og 1000.

Tørvurin á kortum í 1:4000 — 1:5000, tykist at vera stórur, og hevur Matrikulstovan havt samráðingar við m.a. SEV og Landsverkfrøðingin.

Geodætisk Institut hevur ábyrgdina av topografisku kortunum, og er ætlanin at fara undir at gera nýggj grundkort fyri Føroyar.

Sum landsstýrinum kunnugt hava verið samráðingar millum Geodætisk Institut og Matrikulstovuna um henda og aðrar spurningar, og hevur stjórin fyri Instituttið verið í Føroyum í hesum sambandi.

Semja er um, at tey sokallaðu máliborðsbløðini skulu útgevast í sama máli sum frammanundan nevniliga í 1:20.000, og vil Matrikulstovan miða ímóti at grundkortini verða útteknað í 1:8000, við 5 m. ekv. dist. hæddarkurvum.

Hetta gevur møguleika fyri við uppfotografering at fáa kort í 1:4000. Samarbeiðsavtalan miðar fyribils ímóti eini lutffotografering, í 2 hæddum, nevniliga 5000 m. og 2.700 m.

Tann hægra flúgvingin verður nýtt til eina sokallaða analytiska aerotriangulatión, ið verður basis fyri punktgrundarlagnum, meðan tann fægra flúgvingin er grundarlag undir sjálvum kortunum.

Matrikulstovan átekur sær arbeiðið við at signalera ta høgu flúgvingina. Grundað á hetta myndatilfar er møguleiki hjá Matrikulstovuni at gera kort í 1:4000 fyri alt landið ella fyri partar, alt eftir sum mett verður um tørvin.

Miðað verður ímóti at hetta arbeiði verður framt komandi summar, mai/juni, og verður sett burturav til luftfotografering kr. 200 tús.

790 Inntøkurnar eru mettar til 1.3 mill., av hesum 600 tús. fyri sundurbýtisgjøld o.a. Gjaldið fyri frábýti av einum grundstykki liggur um 1000 1200 kr. og vórðu í 1980 skrásett 615 matr. nr. og brúk nr., 475 umskipanir av markum, 133 samanleggingar, 90 marknasetingar o.a., og eru inntøkurnar av hesum arbeiðum umleið 25% av veruliga kostnaðinum.

Hinar inntøkurnar stava frá eigaranna parti av útskiftingarkostnaði og kommunala partinum av matrikuleringskostnaðinum, sølu av myndum, kortum o.ø.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Landsstýrið tekur ikki undir við, at ein hjálpartalgmálari verður settur afturat konto 1014 løn/starvsfólk.

Ad § 17-2520: Royndarstøðin í Hoyvík.

Uppskot til figgjarætlan 1982/83 viðvíkjandi Royndarstøðini.

	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
790 Ymiskar inntøkur	353.115,20	140.000,00	140.000,00	140.000,00
1014 Løn starvsfólk	626.018,94	543.500,00	780.000,00	780.000,00
1016 Sáttmálaløn	0,00	0,00	150.000,00	150.000,00
1028 Løn/onnur	24.567,73	30.000,00	30.000,00	30.000,00
1120 Ferða- og dag-peningur	8.524,80	30.000,00	20.000,00	20.000,00
2060 Borðfæ	1.170,00	0,00	1.000,00	1.000,00
2110 El, hiti og vask	15.918,75	0,00	20.000,00	20.000,00
2140 Umvælingar v.m.	28.033,65	40.000,00	40.000,00	40.000,00
2170 Ognartrygging	11.758,00	15.000,00	15.000,00	15.000,00
2305 Innbúgv	800,00	4.000,00	2.000,00	2.000,00
2315 Prentlutir	7.367,60	9.000,00	5.000,00	5.000,00
2325 Postgjald	4.209,50	6.500,00	8.000,00	8.000,00
2385 Telefon og telex	10.554,00	14.000,00	14.000,00	14.000,00
2356 Aðrar skrivstovu-útreiðslur	10.444,00	9.000,00	9.000,00	9.000,00
2513 Leysafæ	18.127,85	18.000,00	18.000,00	18.000,00
2525 Sáðing	67.567,30	55.000,00	65.000,00	65.000,00
2527 Vakstrarhús	156.408,73	100.000,00	155.000,00	155.000,00
2528 Ísáðingar-útreiðslur	232.217,95	135.000,00	185.000,00	185.000,00
2529 Nýkeyp - amboð/ maskinur	52.131,40	125.000,00	10.000,00	10.000,00

2590 Aðrar útreiðslur	9.519,45	45.000,00	15.000,00	15.000,00
2592 Tænastuakfør rakstur v.m.	42.295,20	24.000,00	35.000,00	35.000,00
	977.519,00	1.063.000,00	1.437.000,00	1.437.000,00

Ad 1014: 1 starvsfólk í 12. lønarflokki
2 starvsfólk í 9. lønarflokki
3 starvsfólk í 7. lønarflokki

Ad 1016: Sáttmálasettur leiðari

Ad § 17-2590/3401-3406: Landbúnaðarstudningur.

Smbrt. skriv dagfest 22. oktober 1981:

Hervið fíggjarætlan fyri 1982/83, ið umfatar:

mjólkarstudningur
studning til súrhoysbrunnar
húsdýralógina
iløgur í Jarðargrunnin
rentustudning og
uppgerð yvir meirinýtsluna 1980/81

		roknskapur 1980/81	játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
mjólkarstudn.	kr.	3.102.729,09	4.850.000,00	5.850.000,00	5.850.000,00
súrhoysbrunnar	—	606.660,09	800.000,00	950.000,00	875.000,00
nýdyrkun o.a.	—	933.825,44	1.500.000,00	1.500.000,00	1.500.000,00
húsdýralógin	—	207.100,09	200.000,00	225.000,00	225.000,00
iløgur í jarðargrunn.	—	3.000.000,00	3.000.000,00	5.000.000,00	3.500.000,00
rentustudn.	—	954.288,61	1.100.000,00	1.700.000,00	1.700.000,00
meirinýtsla 1980/81	—		454.604,22		
	kr.	8.804.603,32	11.904.604,22	15.225.000,00	13.650.000,00

Viðmerkingar til mjólkarstudningin:

Mjólkarmongdin, sum studningur varð latin til í 1980/81, var 31.716 l. sum privatsøla og 3.203.458 l. til mjólkarvirkir, og er hetta ein vøkstur uppá ialt 11% frá árinum fyri.

Mjólkarmongdin, sum innvigað varð til mjólkarvirkini, var 1.799.500 l. teir fyrstu 6 mánaðirnar í 1981/82, ímóti 1.607.560 l. somu tíð árið fyri, ella ein vøkstur uppá 12%.

Meirinýtslan fyri árini 1979/80 og 1980/81 er ialt kr. 902.729,99, ið er samsvarandi við ta meting, sum fylgdi við fíggjarætlanini seinasta ár.

Latin varð studningur til 65.700 kg av neytakjøti, sum er uml. 15.000 kg minni enn árið fyri.

Ein orsøk hertil kann vera, at nú prisurin á innfluttum neytakjøti er hækkaður, kann nakað av føroyska kjøtinum fáa ein pris, sum er omanfyri tann, sum verandi hámarksprísur + studningur kann geva, og tí ikki verður søkt um studning.

Upphæddin á fíggjarætlanini fyri 1982/83 er grundað á ein vøkstur í mjólkarframleiðsluni uppá 12% og ein meðalstudningshækkan uppá 10%.

Viðmerkingar til studningin til súrhoysbrunnar:

Eins og ávíst var seinasta ár fór játtanin ikki at røkka. Ein partur av studninginum til súrhoyggjabrunnar við tey fjós, sum vórðu gjørd seinasta ár, er bókaður 1981/82, og verður tí neyðugt við eini minni hækking av játtanini.

Viðmerkingar til nýdyrkan:

Seinasta fíggjarár vórðu 377.458 m² veltir, ið er væl minni enn árið fyri. Orsøkin er helst vána veðurlag og ein ávís stagnering í fjósbygging, sum partvís skuldast, at ráðið — vegna vána fíggjarumstøður seinasta ár — ikki í sama mun kundu stuðla nýggj tiltøk.

Av tí at roknast kann við, at hetta bert er eitt stutt íhald, metir ráðið tað rætt at lata upphæddina standa við.

Bøumvæling var 55.312 m² í 1980/81.

Viðmerkingar til íløgutørvin:

Við teirri vaksandi dýrtíð, sum hevur verið og er, minkar virðið á íløgujáttanini, sum hevur staðið í stað í fleiri ár. Søkt verður tí aftur í ár um eina játtan uppá kr. 5.000.000,00.

Við løgtingslóg nr. 25 frá 25. mai 1981 fekk ráðið heimild at tæna upp til kr. 15 mill. við landskassaveðhaldi.

Av hesi heimild eru nýttar 1,5 mill. kr., men verður í næstum at fáa um 6 mill. kr. tilvega, m.a. fyri at avgreiða tær seinastu íløgurnar, sum seinasta ár vórðu fíggjaðar við bankatilsøgn.

Tað skal tó viðmerkjast, at við tí muni, sum er millum lánitíðina, sum lán fáast fyri, og útlánstíð ráðsins, eigur hesin møguleiki at verða nýttur við varsemi.

Eisini metir ráðið tað vera rætt at hava eina tilika heimild standandi at taka til, um brádligur tørvur skuldi stungið seg upp.

Viðmerkingar til húsdýralógina:

Meirinýtslan var kr. 7.100,00, meðan hon seinasta ár var kr. 32.581,47.

Í árinum hækkaðu seyða- og neytapremiurnar.

Studningurin til neytaeftirlitið hevur ikki verið broyttur í fleiri ár. Somuleiðis er studningurin hækkaður til rættir við vaskibrunni. Metir ráðið tað tí neyðugt við hesi hækking.

Viðmerkingar til rentustudningin:

Við teimum lánum, sum ráðið hevur og fer at taka í næstum, kemur samlaða lánibyrðan við árslok 1981 at liggja um kr. 15 mill., og við einum miðalrentumuni uppá 11% verður tørvur á eini játtan uppá kr. 1.700.000,00.

Ad § 17-2590/3407 Træplanting.

Smbrt. skriv dagfest 22. oktober 1981:

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
7200-7289 *)	— 43.378	545.000 **)	895.421	700.000

*) sí fylgiskjøl

**) játtað 545.000
brúkt 690.231
inntøka 188.609

Viðvikjandi konto nr. 7200, Skógfriðingarnevndin.

Sum svar upp á skriv Landsstýrisins frá 21. september, j.nr. 400-31 skal eg við hesum upplýsa, at nevndin metir útreiðslurnar, sum eru neyðugar hjá skógfriðingarnevndini fyri 1982/83 at vera hesar:

kr. 895.241,-

sambært tvey viðløgd skjøl og eitt fylgiskjal.

Skjølini eru til skjals á Landsskrivstovuni.

Ad § 17-2590/3410 Savn í Hoyvík, í grunn.

Landsstýrið skjýtur upp, at settar verða 500.000,- kr. í grunn til savn í Hoyvík.

Ad § 18-2710: Tekniska deildin.

Smbrt. skriv dagfest 9. november 1981:

Konto		Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
790	Ymiskar inntøkur	—18.427,90	—15.000,00	—15.000,00	—15.000,00
1014	Løn/starvsfólk	357.475,45	413.000,00	572.305,00	572.000,00
1016	Løn/sáttmálalønt	253.184,35	217.000,00	230.020,00	230.000,00
1050	Samsýningar	58.879,22	55.000,00	60.000,00	60.000,00
1120	Ferða- og dagp.	33.034,70	39.000,00	47.000,00	47.000,00
1210	Skeið	0,00	20.000,00	35.000,00	35.000,00
2030	Lýsingar	923,80	5.000,00	7.000,00	7.000,00
2180	Leiguútreiðslur	0,00	0,00	90.000,00	0,00
2305	Innbúgv	38.588,10	30.000,00	124.000,00	20.000,00
2315	Prentlutir	5.707,19	15.000,00	18.000,00	18.000,00
2325	Postgjald	660,00	2.000,00	2.000,00	2.000,00
2335	Telefon/telex	13.346,70	20.000,00	20.000,00	20.000,00
2350	Sakkøn hjálp	49,50	10.000,00	10.000,00	10.000,00
2356	Aðrar skrivst. útr.	9.266,79	15.000,00	20.000,00	20.000,00
	Tilsamans			1.220.325,00	1.026.000,00

Viðvíkjandi rakstrarstað 2710

Uppgerð yvir væntaðar útreiðslur í fíggjarárinum 1982/83 hjá Teknisku Deild.

Skjal I vísir tað, sum brúkt er í 1980/81, játtan 1981/82 og uppskot yvir væntaðar útreiðslur í 1982/83.

Frágreiðing til omanfyri nevnda:

ad. konto 790. Óbroytt

ad. konto 1014:

Bruttoløn skrivstovufólk	kr.	125.168,00
do eftirlitsmaður	kr.	148.225,00
do Bruttoeftirlitsmaður	kr.	153.912,00
do til nýggjan eftirlitsmann fyri Helmer Christiansen, sum er pensioneraður	kr.	130.000,00
do feriuavloysara	kr.	15.000,00
Núverandi lønir eru hækkaðar við 10%	kr.	572.305,00

ad. konto 1016:	Bruttoløn til leiðara ..... kr.		230.020,00
ad. konto 1050:	Vegna lønarhækkan, eigur hendan at verða hækkað til ..... kr.		60.000,00
ad. konto 1120:	Innanoyggja ferðaútreiðslur mugu økjast til ..... kr.		47.000,00
ad. konto 1210:	Skeiðvirksemi má økjast til tryggleiksfólk kranførarar v.m. ..... kr.		35.000,00
ad. konto 2030:	Útreiðslur til lýsingar mugu økjast í sambandi við skeiðvirksemi til ..... kr.		7.000,00
ad. konto 2180:	Tað er átroðkandi neyðugt við nýggjum hølum til Arbeiðseftirlitið ..... kr.		90.000,00
ad. konto 2305:	Deildini tørvar ein tænastubil. Ein Ford Taunus Station kostar ..... kr. 95.000,-		
	Vegskattur, trygging pr. ár ..... kr. 9.000,-		
	Onnur mátiútgerð ..... kr. 20.000,00		
	..... kr.		124.000,00
ad. konto 2315:	Óbroytt		
ad. konto 2325:	Óbroytt		
ad. konto 2335:	Óbroytt		
ad. konto 2350:	Óbroytt		
ad. konto 2356:	Má økjast til ..... kr.		20.000,00

Ad § 18-2715 Brandvenjingarstøðin við Áir.

Smbrt. skriv dagfest 27. september 1981:

Kontonr. og navn	Rokniskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
	1.449,15	227.500,-	416.250,-	416.250,-

Sbrt. skriv dagf. 27. sept. 1981 frá Brandvenjingarstøðini við Áir:

Í fíggjarárinum 1981/82 hevur Brandvenjingarstøðin fingið játtað 227.500 kr. til útbygging av

1. Mannigarsektión
2. Goymslurúm

sum er helvtin av tí upphædd, sum hetta er mett at kosta.

Eftir stendur útbygging av

3. Umklæðingar- og vaskirúm
4. Kantina/teorihøli

sum verður mett at kosta: ..... kr. 416.250,-

Herí er roknað við 40.000 kr. til fundamentsarbeiði + 12,5% afturat tølunum frá okkara umsókn frá seinasta ár.

Annars verður víst til hjálagda skriv frá 4. nov. 1980.

Nevndin vil við hesum heita á Landsstýri, sum at taka omanfyri nevndu upphædd við á figgjarlógini fyri 1982/83.

ad 3.

Eldsløkkingararbeiðið er sum kunnugt sera skittligt. Neyðugt er tí at fáa til vega umklæðingar- og vaskirúm, og í samband við hesi rúm at innrætta toilettir.

Hesi vælfarsfúm eru ætlað innrættað í húsinum, sum í sínari tíð bleiv nýtt til laboratorium.

ad. 4

Fyri at næmingarnir kunna koma undir tak og fáa sær ein bita at eta, er neyðugt við eini kantinu, ið er ætlað innrættað í húsinum, sum vanliga verður nevnt Ebenezar. Ætlanin er eisini at nýta hetta høli sum teorihøli, tá talan er um aðrar fyritøkur enn skúlarnar.

Ein neyðtelefon má eisini fáast til vega, so at møguleiki er fyri at geva boð frá sær, um skaðatilburður skuldi verið fyri.

Sambært avtalu á omanfyri nevndu fundum, verður hervið biðið um, at Landsstýrið á komandi figgjarlóg tekur helvtina av hesi upphædd við — nevniliga kr. 392.500,- — meðan nevndin søkir Tryggingarnar um at figgja restina.

Tá Brandvenjingarstøðin er endaliga útbygd, er ætlanin, at raksturin av henni skal hvíla í sær sjálvum. Talan er sostatt bert um eina eingangs-játtan.

Endamálið við Brandvenjingarstøðini er at skipa fyri einari hóltari teoretiskari og praktiskari útbúgving í:

a) Fyribyrging av eldsbruna
b) Nýtslu av eldsløkkingaramboðum og
c) Eldsløkking o.a. í hesum sambandi.

Brandvenjingarstøðin vil sostatt koma at fáa stóran týdning í at spara mannaliv og at varðveita virðir.

Nevndin vónar tí, at Landsstýrið vil viðgera umsókn okkara við vælvild.

— — — — — —

Sbrt. skriv dagf. 4. nov. 1980:

Viðvíkjandi fíggjan av útbygging av Brandvenjingarstøðini.

Reff.

1) Fund við landsstýrismann Jákup Lindenskov og J. Hilduberg 4/10-79
2) Fund við landsstýrismann Vilhelm Johannesen 2/4-80
3) Viðlagda skriv frá Landsstýrinum dagfest 19/8-80

Vísandi til omanfyri standandi referansu, skal nevndin fyri Brandvenjingarstøðina við Áir við hesum heita á Landsstýrið um fíggjarligan stuðul til at gera venjingarstøðina lidna, tá nevndin annars ikki sær seg føran fyri at reka hesa sum ætlað.

Sum kunnugt er venjingarstøðin eitt natúrligt og neyðugt lið í undirvísingini á Sjómanns- og Maskinskúlunum. Eisini var hon ætlað til undirvísing av fólki frá reiðarium, kommunum og øðrum fyritøkum.

Fyri at hetta kann lata seg gera á ein skilagóðan og trygdarligan hátt er neyðugt við íløgum til:

1. Manningarsektión	kostnaðaráætlan	375.000 kr.
2. Goymslurúm	do	80.000 kr.
3. Umklæðingar- og vaskirúm	do	190.000 kr.
4. Kantina/teoriháli + neyðtelefon	do	140.000 kr.
Íløgur alt:		785.000 kr.

ad 1. Neyðugt er við eini manningarsektión (stálkonstruktión) í samband við verðandi maskinrúm. Her verður serliga hugsað um eldsløkkivenjingar við CO_2 og Halon, og umstøður til at gera venjingarnar so realistiskar sum møguligt.

ad 2. Tað er átrokandi neyðugt, skjótast gjørligt, at fáa innrættað goymslurúm til tað dýru útgerð støðin í dag eigur, tá henda annars fer fyri skeyti. Rúmið er ætlað innrættað í húsinum har roykkavarabanin er gjørdur.

Ad § 18-2720: Bileftirlitið.

Smbrt. skriv dagfest 7. november 1981:

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
790 Ymiskar inntøkur	— 1.415,7	1.500,0	— 2.050,0	— 2.050,0
1014 Løn/starvsfólk	556.8	650.0	700.0	700,0
1022 Løn/reingerð	74.6	50.0	100.0	100,0
1028 Løn/onnur	423.7	380.0	510.0	510,0
1040 Úrtiðarløn	11.3	10.0	25.0	25,0
1120 Ferða- og dagpeningur	67.6	90.0	120.0	120,0
1212 Eftirútbúgving	1.7	20.0	60.0	60,0
2030 Lýsingar	0.0	1.0	1.0	1,0
2040 Dagbløð, tíðarrit v.m.	1.8	2.0	3.0	3,0
2110 El, hiti og vask	17.0	20.0	30.0	30,0
2180 Leiguútreiðslur	178.6	200.0	275.0	275,0
2305 Innbúgv	0.3	15.0	20.0	20,0
2315 Prentlutir	20.9	10.0	10.0	10,0
2325 Postgjald	4.6	10.0	10.0	10,0
2335 Telefon og telex	32.2	70.0	50.0	50,0
2355 E.D.V.-útreiðslur	18.3	30.0	70.0	70,0
2356 Aðrar skrivstovuútr.	20.3	25.0	30.0	30,0
2530 Amboð	153.8	110.0	150.0	150,0
2590 Aðrar útreiðslur	33.5	30.0	60.0	60,0
2592 Tænastuakfør rakstur v.m.	28.8	30.0	50.0	50,0
3507 Bileftirlit í Grunn	300.0	300.0	2.000.0	1.000,0
Hálkubreyt				500,0
Tilsamans	531.9	556.0	4.224.0	1.724,0

ad 790 Inntøkur

Við tað at vøksturin í bilatalinum er í minking verður mett, at meiriinntøkan í mun til seinasta ár bert 50.000,- kr. fyri sýn og koyriroyndir.

ad 1014 Løn Starvsfólk.

Viðmerkingar tað sama sum seinast. Maðurin sum fekk farloyvi er ikki avgreiddur enn. Starvið verður sett í fyrstu framtíð, men eigur annað fastlønt starv at normerast.

ad 1022 Løn/Reingerð.

Í ár er yvirtrekk á hesi konto.

ad 1028 Løn/Onnur.

Viðmerkingar sama sum seinast. 16000 lógskildug sýn árliga vil siga at minst 6 mans verða at arbeiða 7 t. eff. og hava tá 15 min. til hvønn bil. Í dag eru í besta lagið 4 mans tøkir til sýnsarbeiði.

ad 1040 Ørtiðarløntir.

Vit søktu um 25.000,-, men fingu 10.000,-. Við tað at stovnurin hevur verið húsvillur til bilsýning í summar, so hava vit sjálvir arbeitt, og tað eisini um kvøldið, við at stoypa og smíða fyribils sýningarhøli. Lyktakanning hevur eingin verið í ár.

ad 2355 EDV Útreiðslur.

Frá Gjaldstovuni hava vit fingið orientering um at kostnaðurin verður 70.000,00 kr. fyrsta árið.

ad 2530 Amboð.

Fyrst í komandi árið verða vit at finna annað egnað høli til leigu í Eysturoy, og tá verða vit at fáa tól til m.a. at kannað bremsur við, eins og vit hava tað í Tórshavn, á Tvøroyri og í Klaksvík.

Viðvíkjandi umsókn okkara til byggigrunnin verða vit enn einaferð at gera galdandi, at húsið er ógvuliga átrokandi at fáa, vit kunnu ikki húsast undir Glasheyggi longur.

Peningur til hálkubreytina er neyðugur, fyri at vit kunnu byrja at arbeiða við málinum. Økið skal fáast til vega og projektering skal gerast.

Evni : Figgjarlógaruppskot fyri 1982/83

Skjøl : 1) Uppskot fyri 1982/83
2) Viðmerkingar til figgjarlógaruppskot 1982/83
3) Skriv og viðmerkingar til uppskot fyri 1981/82
4) Skriv sent landsstýrið viðvíkjandi bygging av høli til bileftirlitið í Tórshavn.
5) Rapport viðvíkjandi hálkubreytum.

Vísandi til omanfyristandandi, verður undirritaði at seta fram hesar viðmerkingar.

ad 1) Samanumtikið kann tað tykjast sum um at vøksturin frá játtanini 81/82 er stórur, men so er ikki, skeivleiki kom í seinasta ár, við tað at játtanin frá árinum fyri bleiv sett sum lóg, men bert við inntøkubroyting. Ivan Johannesen og Torbjørn Poulsen eru báðir varugir við Tilburðin. Munurin millum útreiðslur og stovnsins egnu inntøkur er bert kr. 124.000,00.

ad 2) Í stuttum eru gjørdar viðmerkingar til einstøku postarnar, sum eftir ábeitan verða at gerast gjøllari.

ad 3) Fyri at geva ábending um viðmerkingar frá undanfarna árið er hetta skjal hjálagt.

ad 4) Bygging av egnum høli er við at verða eitt gamalt mál. Grunnurin er nærum líka gamal, men tómur. Grundøkið eiga vit og tann 26.2.81 skrivaðu vit til landsstýrið við umbøn um at farast kundi undir skitsuprojektering. Bert í Havn gjalda vit 120.000 kr. um árið í húsaleigu og so eru umstøðurnar sera ringar og ineffektivar.

ad 5) Í øllum grannalondunum er tað nú krav, at øll fólk sum læra at koyra, skulu fáa kynstur í hálkukoyring og í koyring í myrkri. Fyri at fremja hesa týdningarmiklu frálæru, er neyðugt við hálkubreyt, sum verður mett at kosta 2-3 milliónir, nógv avhengugt av lendinum har hon kemur at liggja. Útlit er fyri at raksturin er førur fyri at bera útreiðslurnar. Upplýsingar hesum viðvíkjandi eru fingnar til vega bæði úr Noreg og úr Danmark.

Eins og undanfarnu ár er tað vón okkara, at tað arbeiði sum bileftirlitsstovnurin stendur fyri, og er lógarbundin av, verður mett soleiðis, at tað er og eigur at verða ein týðandi táttur fyri at darva og minka um tað ovurhonds stóra talið av ferðsluvanlukkum sum raka land okkara.

Fyri bert at vísa á partar av ferðslumyndini, sum hon er, so brúka føroyingar

til vegir, herundir viðlíkahald v.m.	u.l. 100.000.000 kr./ár
til bilar, herundir innflutningur	u.l. 90.000.000 kr./ár
til aflurgerðing av brotnum bilum	u.l. 15.000.000 kr./ár
	u.l. 205.000.000 kr./ár

Sambart hagtøl doyggja 7 menniskju og eru 28 menniskju vorðin avlamin fyri lívið í ferðsluni um árið her í Føroyum.

Lutfallsliga eru hesi tøl ovast í Europa.

Tá lítla »framkomna samfelag okkara í **1981, ár teirra brekaðu,** skal hava met í ferðsludrápum og í framleiðslu av brekaðum fyri lívið, so eigur hesin veruleiki at elva til umtanka og eggja til móttiltøk.

Fúsir at fara til verka, vóna vit at fáa sømuliga undirtøku.

Ad § 18-2721 Radioeftirlit

Smbrt. skriv dagfest 14. oktober 1981:

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
Radioeftirlitið	172.000	100.000	250.000	250.000

Vísandi til brævv landsstýrisins dagfest 7.9.81 skulu vit mæla til, at settar verða kr. 250.000,- á tiggjarløgtingslóg 1982/83 til doyvan av radioóljóði v.m.

Arbeiði verður røkt av einum manni við tænastubili. Neyðugt er at hava amboð, tól og nakað av tilfari.

Um so er, at Sjónvarp Føroya verður sett á stovn, verður arbeiðsøkið munandi viðkað, og neyðugt verður umframt neyðuga útbúgving, at útvega eftirlitinum hóskandi tól til hetta endamál.

Higartil hevur doyvan av radioóljóði verið at funnið á tiggjarløgtingslógini undir § 15 (visindi, bókmentir og list) rakstrarstað 2390 (ymiskir studningar). Men studningar eru útsettir fyri niðurskurði tá sparast skal, og so hevur eisini verið í hesum føri, sí hjásettu talvu.

kr. 1000	76/77	77/78	78/79	79/80	80/81	81/82
rakstrarroknsk.	100	224*)	165	149	172	190**)
játtað	100	120	120	100	100	100

*) keyp av akfari

**) mett

Meira náttúrligt hevði verið, um útvarpseftirlitið kom undir § 18 (handil, iðnaður o.t.) eins og arbeiðseftirlitið, bileftirlitið v.m. Vit mæla til at so verður, fyri at sleppa undan, at munurin millum rakstrarroknskap og játtaðar upphædd skal gerast størri og størri.

Hjálagt frágreiðing frá radioóljóðseftirlitinum fyri árið 1980. Hvat viðvíkir bølisviðurskiftum er gjørligt, nú umbyggingin er við at vera liðug, at hýsa radioeftirlitinum; men við teim broytingum, ið eru í vænti við stovnsetan av sjónvarpi eigur at vera umhugsað hvussu eftirlitið skal skipast í framtíðini, — um tað framvegis skal arbeiðast útfrá telefonverkinum ella um tað skal skipast á annan hátt. Annars vil eg mæla landsstýrinum til, at tað verður gjørd ein nágreinilig reglugerð fyri radioeftirtitið.

Frágreiðingin er til skjáls á Landsskrivstovuni.

500

Fíggjarætlan fyri 1982/83

inntøkur

		inntøkur
Tilskot frá Landinum	kr.	248.500
Tilskot frá Tryggingarsambandinum	kr.	248.500
Tilskot frá Kommunum	kr.	30.000

		útreiðslur
a. Lønir	kr.	200.000
b. Bókføring og grannskoðan	kr.	6.000
c. Lýsingar, porto og telefon	kr.	25.000
d. Leiga, ljós og reingerð	kr.	22.000
e. Aðrar útreiðslur	kr.	4.000
f. Tiltøk í komandi fíggjarári	kr.	212.000
g. Samsýning til limir í undirnevndum	kr.	25.000
h. Ferðaútreiðslur og fundir	kr.	12.000
i. Keyp av tilfari	kr.	20.000
		527.000

Að § 18-2723 Ráðið fyri ferðslutrygd:

Sbrt. skriv frá stovnínum:

Viðmerkingar til útreiðslusíðuna:

a. Lønir til leiðaran og skrivstovufólk 1/2 dag.
b. Útreiðslur til grannskoðan samb. roknskap
c. Útreiðslur til lýsingar, porto og telefon samb. roknskap
d. Útreiðslur til leigu, ljós og reingerð samb. roknskap ; Ráðið metir tað hava týdning við upplýsandi og agiterandi lýsingum í dagbløðunum.
e. Ætlaðar aðrar útreiðslur
f. Tiltøk í komandi fíggjarári samb. hjálagda yvirlit
g. Samsýning til limir í teimum serligu undirnevndum sum eru settar av starvsnevndini.
h. Ætlaðar ferðaútreiðslur og útreiðslur í samband við almennar fundir um ferðslutrygd.
i. Ætlaðar útreiðslur til keyp av undirvísingartilfari ið ókeypis verður latið skúlum og barnagørðum.

Yvirlit yvir tiltøk í fíggjarárinum 1982/83

1.	Koyring uttanlands	kr.	10.000,-
2.	Koyring í Føroyum	kr.	2.000,-
3.	Tilfar til barnagarðar	kr.	10.000,-
4.	Tilfar til skúlar	kr.	17.000,-
5.	Ferðsluringur barnanna	kr.	30.000,-
6.	Lyktakanning	kr.	8.000,-
7.	Árliga frágreiðingin frá RFF	kr.	10.000,-
8.	Norrøna ferðslutrygdarárið 1983	kr.	15.000.
9.	Uppsetigarvirksemi hjá fólkaskúlanum	kr.	60.000,-
10.	Skeiðvirksemi í Føroyum	kr.	50.000,-
			212.000,-

Viðmerkingar til samanstandandi:

ad 1. Nýprenta av hetta tiltak koyring uttanlands (meirútreiðsla)
ad 2. Nýprenta av leiðbeinan ætlandi fremmandum bilførarum ið higar koma.
ad 3. Samprenting við Tryggs Trafikk í Noregi um tilfar itil barnagarðar
ad 4. Samprenting við Tryggs Trafikk í Noregi um tilfar til skúlar
ad 5. Framhald av arbeiði sum er í gerð
ad 6. Lyktakanning eins og undanfarin ár
ad 7. Nýtt tiltak RFF fer uppá
ad 8. Norrøna ferðslutrygdarárið sum verða skuldi í 1982 er útsett til 1983 og eru vit bidnir at verða saman við hinum norðanlondunum um felags tiltøk (meirútreiðsla)
ad 9. Vit hava higast sí hjálagdu frágreiðing frá formanninum
ad 10. Ferðslutrygdarskeið sum RFF skipar fyri annað hvørt ár (1979 - 81 - 83) hetta er ætlað lærarum úr fólkaskúlanum, læraraskúlanæmingum, koyrilærarum, bileftirlitsfólki og politistum.

Viðmerkingar til ad 9.

Ráðið metir tað verða bráneyðugt, so sum støðan við vanlukkum, deyða og varandi meini, orsakað av ferðslu, er í løtuni, at vaksa um virkið sítt við persónligum vitjanum úti í feløgum, fyritøkum, samkomum og skúlum um stóran part av landinum.

Hetta tiltak kann setast javnt við ta agitatión, sum verður gjørt m.a. fyri fráhaldsmálinum.

Ráðið hugsar sær at fáa eitt fólk, ið átekur sær at vera til hjálpar í 6 mánaðar av árinum, tó so, at tað ikki er talan um fast starv, men at starvið verður sett av nýggjum fólki á hvørjum ári. Tað verður hugsað um at fáa lærarafólk, blaðfólk o.tl. at átaka sær hetta starv, ið skal virka undir liðini á tí arbeiðinum, sum dagligi leiðarin fyri ráðnum fremur.

Ráðið metir hetta arbeiði hava bráskund, nú, vit í meðal árliga hava 10 andlát av ferðsluvanlukkum, og eini 25 fáa varandi mein fyri livið í okkara lítla landi.

— — — — — —

Viðmerking frá landsstýrinum:

Landsstýrið skjýtur upp at játta 200.000 kr.

Ad § 18-2726 Filmseftirlit.

		Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83
Uppsk. I	1828	løn/onnur	6.000 kr.	15.000 kr.	15.000 kr.
	1050	samsýn-			
		ingar	124.225 kr.	135.000 kr.	150.000 kr.
		samtals	130.225 kr.	150.000 kr.	165.000 kr.

	Konto		Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
Uppsk. II	1828	løn/onnur	6.000 kr.	15.000 kr.	20.000 kr.	20.000 kr.
	1050	samsýningar	124.000 kr.	135.000 kr.	115.000 kr.	115.000 kr.
		samtals	130.000 kr.	150.000 kr.	135.000 kr.	135.000 kr.

Viðmerking:

Uppskot I: byggir á, at núverandi biograf- og censurlóg og skipan verður galdandi fyri fíggjarárið 1982/83.

Kt. 1828 sum er løn til formannin fyri umsiting av stovninum er ikki pristals viðgjørd, men ætlast útr. her at kunna haldast innanfyri 15.000 eisini í 1982/83.

Kt. 1050 er samsýningar til nevndarlimirnar (fundarpeningur) og væntast hann at hækka við pristalinum uml. 12,5% og tískil upp til uml. 150.000.

Uppskot II: byggir á, at landsstýrið fær framt lógarbroyting til 1982/83 við m.a. 12-ára censurmarki, sum vit meta í hvussu atløgu at bera í sær umt. 20% færri fundir. Mett verður at hetta svarar til ert forbrúk í samsýningum/fundarpeningi upp á 100.000 kr. í 1981-prísum, sum vaksið við 12,5% í prístalshækkingum til 1982/83 svarar til kr. 115.000 kr. Skrivstovu- og ørindaarbeiði hjá formanninum metist undir hesi skipan at økjast nakað, og verður hetta í 1982/83-prísum mett at kosta 20.000 kr.

Viðmerking til virkisviðurskifti filmseftirlitsins í løtuni:

Undanfarnu árini hevur tað vist seg at bera til hjá *Filmseftirlitinum* at gera rættuliga beinrakin játtanaruppskot til figgjarløgtingslógina. Uppskotini hava samsvarað beilt væl við roknskapin, hóast játtanirnar hava verið ov trongar, burtursæð frá í ár, hvar játtan og roknskapur munnu fara at samsvara væl.

Filmseftirlitsarbeiði er ein bundin uppgáva, soleiðis at skilja, at filmseftirlitið *skal* censurera teir filmar, sum vera innfluttir til fyrivísingar. 90% av roknskapinum hjá filmseftirlitinum skal samb. játtanina fara til samsýningar (t.e. fundarpeningur), og eftirsum hesar vaksa við prístalinum, mugu játtanirnar sjálvsagt vaksa tilsvarandi.

Í løtuni eru framtíðarútlitini eitt sindur ógreið.

Summir biografar hava bert opið ávís kvøld, meðan aðrir hótta við at gevast. Ein skuldi tiskil rokna við færri filmum og minni censurarbeiði, men tykist tað í løtuni heldur at ganga hinvegin. Orsøkin er helst, at filmarnir ganga stytri og tessvegna mugu fleiri filmar til. Ein onnur orsøk kann vera, at biografarnir í størri mun innflyta filmar á censurmarkinum, fyri at sýna fólki nakað meira forkunnugt. Í hvussu er tykist filmseftirlitið at hava úr at gera fyri tíðina.

Annars hava filmsinnflytarar og kanska serliga filmseftirlitið ferð eftir ferð gjørt vart við tað óhanduga og fyri filmseftirlitið arbeiðskrevjandi *ikki at hava nakað 12-ára aldursmark eins og aðrastaðni.* Filmseftirlitið hevur áður mett, at útreiðslurnar í so máta høvdu minkað við umt. 30%, eftirsum tað tá hevði kunnað greitt fleiri filmar gjøgnum tað skrivliga tilfarið eina.

Seinastu royndirnar vísa kortini, at tað í ein ávísan mun avlíkavæl verður neyðugt at halda eyguni eftir slíkum barna- og ungdómsfilmum og taka stikprøvar av og á.

Orsøkin er at áskoðanin og siðalagið viðv. lógarinnar bókstavi um »krænkelse af den offentlige ærbarhed« og »gudsbespottelse« er nakað øðrvísi enn t.d. í Danmørk, har teir flestu filmarnir vera innfluttir frá.

Vit hava fesk dømi um filmar, sum vit vegna »gudsbespottilsi« hava kent okkum noyddar at totalbanna, hóast somu filmar hava verið loyvdir í Danmørk — eisini fyri smábørnum, eins og mangir barna- og ungdómsfilmar við seksuellum innihaldi hava borið í sær klagur frá foreldrum. Men hóast eitt forsvarliga virksamt eftirlit eisini her — vildi filmseftirlitið mett, at ein lógarbroyting við m.a. skráseting av 12-ára aldursmarki vildi borið í sær fyribils eina sparing upp á umt. 20% í fundarpeningaútreiðslum.

Að § 18-2730 Skipaskrá og uppmáting.
Smbrt. skriv dagfest 24. september 1981:

. . . . . með bemerking, at útgjaldsupphæddin í fíggjarárinum 1980/81 hevur andragið kr. 7.597,00.

Fyri fíggjarárið 1982/83 vil útgjaldsupphæddin framvegis verða kr. 35.000,-.

Landsstýrisins uppskot 25.000,- kr.

Að § 18-2731: Semingsmannaskipanin.
Smbrt. skriv dagfest 1. oktober 1981:

Viðvíkjandi fíggjarløgtingslóg 1982/83
Rakstrarstað 2731 — Semingsmannaskipanin

Vísandi til skriv Landsstýrisins frá 7. september 1981 skal eg siga frá, at eg meti útreiðslurnar í 1982/83 soleiðis:

Konto 1050 Lønir 1.100 x 24	kr. 26.400,00
Konto 2590 Aðrar útreiðslur	kr. 25.000,00

Lønirnar eru roknaðar sum samsýningar til báðar semingsnevndirnar. Í løtuni er samsýningin kr. 1.049,00 um mánaðan.

Aðrar útreiðslur eru fundarútreiðslur, tá ið semingsstovnurin er við til sáttmálasamráðingar.

Landsstýrisins uppskot 51.400,- kr.

Að § 18-2733 Læruráðið
Smbrt. skriv dagfest 26. oktober 1981:

. . . . . um uppskot til fíggjarløgtingslóg 1982/83 viðvíkjandi rakstrarstaði nr. § 18-2733. Læruráðið loyvir sær á komandi fíggjarlóg at søkja um kr. 285.500,00.

Uppskotið sær soleiðis út:	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
1. Ymiskat inntøkur:	kr. —.7.500,00	kr. — 7.500,00
2. Løn/ommur:	kr. 20.000,00	kr. 20.000,00
3. Samsýningar:	kr. 250.000,00	kr. 250.000,00
4. Ferða- og dagpeningur:	kr. 5.000,00	kr. 5.000,00
5. Lýsingar:	kr. 3.000,00	kr. 3.000,00
6. Prentlutir:	kr. 10.000,00	kr. 10.000,00
7. Aðrar útreiðslur:	kr. 5.000,00	kr. 5.000,00
	kr. 285.500,00	kr. 285.500,00

Viðmerkingar:

ad. 1. Lærurádið hevur inntøkur av tilmeldingunum til sveinaroyndirnar. Hvør tilmelding kostar kr. 50,00.

ad. 3. Her er talan um samsýningargjald til skoðanarmeistarar.

ad. 6. Útreiðslurnar til prentlutir kunnu metast at gerast minni í komandi ári.

Ad § 18-2790/3504: Til menningargrunn.

Landsstýrið skjýtur upp at 8.000.000,- kr. verða játtaðar í Menningargrunnin.

Ad § 18-2790/3505: Til Orkugrunn.

Landsstýrið skjýtur upp at 5.000.000,- kr. verða játtaðar í Orkugrunnin.

Ad § 19: 2805-2810-2820: Fólkapensjón v.m.

Smbrt. skriv dagfest 6. oktober 1981:

Konto í 1.000 kr.	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot stovnsins 1982/83	Uppskot landsstýrisins 1982/83
2805 Fólkapensjón	47.218	47.835	60.500	69.500
2810 Avlamispensjón	18.459	18.230	23.750	23.750
2820 Barnastyrkur til stakar uppihaldarar	1.200	1.000	1.475	1.475
2830 Einkjupensjón	2.596	2.560	2.565	2.565
2840 Vanlig forsorg	1.276	1.565	2.415	2.415
2845 Víðkað hjálp	669	580	1.110	1.110
2850 Einkjuhjálp	2.081	1.865	2.960	2.960
2855 Barnaforsorg	2.722	2.520	3.095	3.095

2860 Heimahjálparaskipanin	9.350	10.000	13.000	13.000
2865 Dagpeningaskipanin	6.247	6.400	8.785	8.785
2875 Brennistudningur til pensjónistar	—	—	—	3.500
2880 Bjálving av húsum hjá pensjónistum	—	—	—	3.000
2890/3661 Ellisheim	670	650	800	800

. . . . . .

Sostatt eru landskassans útreiðslur til almannamál fyri 1982/83 mettar til 120.455.000 kr., meðan játtaðar eru 93.205.000 kr. fyri 1981/82 og eftir fyribils roknskapi nýttar 92.417.071 kr. í 1980/81. Um hetta visa vit annars til endan av hesum viðmerkingum.

Játtanin til Fritíðarheimið í Skrivaragøtu, 1.080.000 kr., er eins og áður tald við undir útreiðslunum til Vanliga forsorg.

Metingarnar eru gjørdar sambært skrivligu leiðbeiningina sum vit hava fingið og skulu vit tá leggja fylgjandi aftrat:

Útgjaldingarnar av almanna-veitingum fevna um fólkapensión, avlamispensión, heimahjálp, dagpening og ymisk sløg av hjálp annars.

Tølini á móttakarum vóru pr. 1. januar 1981 hesi:

Fólkapensión 4.198, avlamispensión v.m. 1.128, einkjupensión 135, einkju barnapening 368, barnaforsorg 74, hjálp eftir forsorgarlógini 256, dagpeningur 208, heimahjálp 656 (heim).

Roknað er við, at talið á fólka- og avlamispensiónistum økist við umleið 2% árliga.

Útreiðslan til dagpening er mett eftir útreiðsluni v.m. fyri tíðina 1. juli til 30. september 1981 og hava vit ikki roknað við hækking í talinum av móttakarum.

Viðvíkjandi vøkstri í virkseminum er annars roknað við eini hækking í útreiðslunum til fólkapensión uppá 1.200.000 kr. vegna nýggja røktarheimið í Klaksvík, sum væntandi kemur í nýtslu uml. tann 1. januar 1983. Eisini er roknað við eini hækking í útreiðslunum til avlamispensión uppá 1.250.000 kr. vegna nýtt vistarheim í Klaksvík, sum ætlandi kemur í nýtslu uml. 1. januar 1982. Roknað er við samsvarandi hækkingum á konto 3661 Ellisheim.

Roknað er við, at útreiðslan til heimahjálp hækkar við umleið 6% og er hetta orsakað av, at tørvurin á heimahjálp framhaldandi økist og kemur haraftrat at royndir sýna, at tey sum fáa heimahjálp sum heild eru meira brekað enn fyrr.

Sum álagt undir pkt. 5 í leiðbeiningini er roknað við eini øking uppá 12 1/2% av teimum tølum, sum vit annars hava roknað út og mett grundað á viðurskiftini (útgjaldingum) pr. 1. juli 1981. Tá talan er um fólka- og avlamispensión v.m. er hendan hækkingin tó gjørd í mun til útreiðslurnar pr. 1. oktober 1981, av tí at hesar eru grundaðar á danska juli-pristalið.

Fyri ordans skuld skulu vit gera vart við, at uppskotið hesa ferð er uppsett á annan hátt enn vanliga, av tí at vit í ár hava íroknað væntaðar hækkingar í talinum av móttakarum og serliga — sambært pkt. 5 í leiðbeiningini — hava íroknað framtíðar hækkingar (pristalshækkingar) við 12 1/2 %. Áður hava vit ikki íroknað slíkar hækkingar. Um fram skuldi verið farið sum í farnu árum hevði samlaða talið 120.455.000 kr. í staðin verið um 107.000.000 kr.

— — — — —

Viðmerkingar frá landsstýrinum.

Konto 2805 Fólkapensión.

Ætlan landsstýrisins er at leggja fram uppskot fyri tingið um hækkan av pensiónsgjøldunum og verða hesar útreiðslur mettar til umleið 9. milj. kr.

konto 2805 Fólkapensión	60.500.000 kr.
+	9.000.000 kr.
	69.500.000 kr.

Konto 2875 Brennistudningur til pensionistar.

Ætlan landsstýrisins er at leggja fram uppskot fyri tingið um brennistudning til pensiónistar. Útreiðslurnar verða mettar til 3,5 milj. kr.

Konto 2880 Bjálving av húsum hjá pensiónistum.

Ætlan landsstýrisins er at leggja fram uppskot fyri tingið um stuðul til bjálving av húsum hjá pensiónistum.

Útreiðslurnar verða mettar til 3 milj. kr.

Ad § 19-2890/3668: Húsalánsgrunnurin.

Smbrt. skriv dagfest 16. oktober 1981:

Vísandi til skriv landsstýrisins um uppskot til figgjarløgtingslóg 1982/83 viðvíkjandi rakstrarstaði § 19-2890/3668, verður send uppstilling yvir virki grunnsins fíggjarárið 1980/81, meting fyri 1981/82 og meting fyri fíggjarárið 1982/83.

Víst verður á, at grunnurin hevur tøkan pening til restina av fíggjarárinum 1981/82, tá ið játtaða talið yvir fíggjarlógina er við.

Vart verður gjørt við, at tær játtaðu 10 mió. kr. yvir fíggjarlógina, ikki eru goldnar enn.

Viðvíkjandi fíggjarárinum 1982/83, so eru tølini mett procentvís frá báðum undanfarnu árunum, og vísir hetta ein likviditetstørv uppá uml. 31.000.000,00 kr.

HÚSALÁNSGRUNNURIN 16.10.1981

Roknskapur 1980/81:

487 veitt lán, herav	217 lán til nýggj sethús undir 120 m² á	100.000,00	21.700.000,00
	160 lán til nýggj sethús yvir 120 m² á	60.000,00	9.600.000,00
og	110 umbyggingarlán		2.714.000,00
			34.014.000,00
	190 eftirgjaldingar frá 60. til 100.000,00		7.600.000,00
			41.614.000,00

Mett fyri 1981/1982:

500 lán sundurgreind soleiðis:

247 lán til nýggj sethús undir 120 m² á	120.000,00	29.640.000,00
133 lán til nýggj setlus yvir 120 m² á	60.000,00	7.980.000,00
120 umbyggingarlán		3.240.000,00
		40.860.000,00

Húsalánsgrunnurin 16.10.1981

Roknskapurin 1980/81:		**Mett 1981/82**		**Mett 1982/83**
Útlán	41.614.000,00	40.860.000,00		45.000.000,00
Rentuútreiðslur	5.200.000,00	6.600.000,00		7.000.000,00
Avdráttir av lánum	1.100.000,00	1.500.000,00		1.500.000,00
Rakstur	1.030.000,00	1.150.000,00		1.300.000,00
	48.944.000,00	50.110.000,00		54.800.000,00
Renta av útlánum	9.800.000,00	13.700.000,00		16.500.000,00
Aðrar rentuinnt.	1.400.000,00	1.000.000,00		500.000,00
Avdráttir av útlán.	4.500.000,00	5.100.000,00		6.800.000,00
Yvir figgjarlógina	10.000.000,00	10.000.000,00		
	25.700.000,00	29.800.000,00		23.800.000,00
Lán	26.000.000,00	27.000.000,00	Likv. tervur	31.000.000,00
	51.700.000,00	56.800.000,00		54.800.000,00

Ad 19-3671: Føroyahús í Keypmannahavn.

Landsstýrið søkir um heimild at útvega føroysku feløgunum í København samkomuhøll.

Málið: Føroyahús í København hevur ikki enn funnið eina endaliga loysn í landsstýrinum. Tað eru serliga spurningarnir um hvørji virksemi, ið skulu verða í húsinum, støddd og kostnað, útvegan av byggigrund og hvør skal standa fyri og gjalda bygging og rakstur, sum enn ikki eru nóg mikið greiddir til at støða kann takast. Tað er tó landsstýrisins ætlan nú at skriva til ríkismyndugleikarnar um at tryggja húsinum byggilendi, talan er um einar 4.000 m² á Artillerivej á Amager, soleiðis at landsstýrið fær eitt leigumál av hesi ognini uppá hondina til endalig støða er tikin.

Til positiv principstøða er tikin, og til at húsini í givnum føri eru liðug til nýtslu at ganga í besta føri eini 3-4 ár. Umhugsað er tí at byrja við einum hóskandi leigumáli við tí endamáli at royna hvørji virksemi eiga at verða tikin við, talan er eisini um føroyska skúlan í København, og um leiðsluna, hvussu hon eigur at verða samansett. Landsstýrið skal í øllum føri hava aktivt umboð í leiðsluni.

Viðskiftastovan í København hevur saman við føroysku feløgunum samráðst um málið, og er funnið fram til hølir, ið eftir umstøðunum kunnu góðtakast sum ein fyribils loysn av húsaspurninginum.

Hølini eru í Rosenborggade 5A og eru 200 m² til støddar í 2 hæddum, teknitg er hjáløgd, ársleigan er 100.000 kr. Viðskiftastovan er sinnað at fyrisita leigumálið herundir at gjalda leigu og innkrevja tað, sum feløgini skulu gjalda. Umsjónarmaður verður settur til dagligu eftiransingina.

Ársfiggjarætlanin sær soleiðis út:

Húsaleiga	100.000 kr.
Ljós og hiti	25.000 kr.
Umsjónarmaður	20.000 kr.
Broytingar og umvælingar	20.000 kr.
Reingerð o.a.	25.000 kr.
	190.000 kr.
Inntøkur (frá feløgunum og skúlanum)	50.000 kr.
Munur	140.000 kr.

Talan er um at byrja til heystar.

Landsstýrið hevur fyri sín part samtykt at styðja tiltakið og at avmarka stuðulin til húsaleiguna 100.000 kr., ljós og hita 25.000 kr. og til eina einaferðstudning til

broytingar og umvælingar uppá 20.000 kr., tilsamans 145.000 kr. uppá ársgrundarlag, í 1981/82 82.500 kr.

Í grunninum: Føroyahúsið í København eru í dag um 1.450.000 kr.

Vísandi til tað, ið her er flutt fram, søkir landsstýrið um heimild til *í eini 2-3 ára royndartíð úr grunninum: Føroyahúsið í København til umrødda tiltak at veita í ársstudningi 125.000 kr., tó 82.500 kr. fyri tíðarskeiðið 1. oktober 1981 til 31. mars 1982.*

— — — — — —

Viðmerking frá landsstýrinum.

Landsstýrið skjýtur upp at veita 275.000 kr.,

herav		
	til rakstur	145.000,- kr.
	til bygging	130.000,- kr.
	Tilsamans	275.000,- kr.

Ad § 19-2890/3672: Skúlin á Trøðni.

Smbrt. skriv dagfest 20. februar 1981:

Vísandi til skriv frá Socialstyrelsen dagfest 29/1-1981, j. nr. 5552-16, og sum stýrið hevur fingið kopi av d. d. og til fundin, sum stýrið hevði í dag 20. februar 1981, sendi eg hervið fíggjarætlan fyri skúlan fyri 1982, soleiðis sum avgjørt var á fundinum í 5 eintøkum.

Sambært tað, ið viðtikið varð, sendir stýrið tilfarið við sínum viðmerkingum til socialstyrelsen (í 2 eintøkum) og til Føroya Landsstýri.

Institution:

BILAG 1
(side 1)

Skúlin á Trøðni -
Føroya Spesialskúli
Tórshavn

FINANSLOVFORSLAG 1982

Kto nr.	Kontobetegnelse	Regnskab 1980	Bevilling 1981	Forslag 1982
01	Lønninger m.v.	5.045.963	5.121.100	6.122.300
02	Særskilt vederlæggelse			
03	Overarbejdsbetaling	226.206	165.000	223.600
04	Merarbejdsbetaling			
	Lønkonti i alt (01 + 02 + 03 + 04)	5.272.169	5.286.100	6.345.900
06	Særlige ydelser	486.429	473.500	460.400
07	Tjenesterejser og befordring	41.363	58.000	67.000
10	Kontorhold	70.103	46.500	77.000
12	Fremmede tjenesteydelser	576.914	436.100	627.300
15	Køb af materialer	306.148	168.900	413.800
20	Anskaffelse af materiel m.v.	43.200	100.000	80.000
21	Driftsmidler m.v.	216.841	115.500	278.500
22	Reparations- og vedl.h.arb.	98.254	90.000	90.000
25	Husleje			
30	Kommunale skatter og afgifter			
31	Renter og afdrag	9.351	0	9.000
32	Forrentning af egne aktiver			
33	Afskrivning			
37	Interne statslige overførsler			
39	Diverse udgifter			
	Øvrige driftskonti i alt (06-39)	1.848.603	1.488.500	2.103.000
	Udgifter i alt	7.120.772	1.774.400	8.448.900

FINANSLOVFORSLAG 1982

Kto nr.	Kontobetegnelse	Regnskab 1980	Bevilling 1981	Forslag 1982
41	Leje	8.200	7.600	8.500
42	Salg af brugt materiel og inventar			
43	Salg af producerede ydelser			
44	Skatter og afgifter			
	Renter			
48	Kommunale refusioner			
49	Diverse indtægter			
	Indtægter i alt	8.200	7.600	8.500

Alle forslagsbeløb angives i hele hundrede kroner.

Ad § 20-2901/1060: Pensjónsgrunnur.

Smbrt. skriv dagfest 5. oktober 1981:

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83
§ 20 2901-1060 Pensjónir	456.366,48	500.000	740.000
2901-1062 Tænastumannaeftirl.	1.308.045,71	1.319.000	1.499.000

Pensjónirnar eru roknaðar út frá útgjaldingum pr. 1.9.81 + 5 dýrtíðarviðbøtur.

Tænastumannaeftirlønirnar eru roknaðar út frá útgjaldingunum pr. 1.10.81 + 3 dýrtíðarviðbøtur.

Ad § 20-2901/1061: Biðipeningur.

Smbrt. skriv dagfest 5. oktober 1981:

Konto	Roknskapur 1980/81	Játtan 1981/82	Uppskot 1982/83
§ 20 2901-1061: Biðipeningur	886.841,84	1.000.000	1.455.000

(x

Sambært hjálagda yvirlit eru píðipengarnir pr. 1.10.81

116,229,23 um mð. ella í 12 mðr.	kr.	1.395.000,00
+ 3 dýrtíðarviðbøtur	kr.	83.000,00
— biðipengar í 4 mðr.	kr.	— 23.000,00
	kr.	1.455.000,00

x) Yvirlitið er til skjals á Landsskrivstovuni.

Ad 23-3815: Kirkjugrunnurin.

Sambrt. skriv dagfest 15. oktober 1981:

Under henvisning til landsstyrets skrivelser af 7. og 21. september 1981 (j.nr. 400-31 105) vedrørende forslag til lagtingsfinanslov for finansåret 1982/83 skal man herved forslå, at der på konto § *23-3815 Kirkefonden* optages et beløb på 2.020.000 kr. Til sammenligning er anført regnskabstal for finansåret 1980/81 og bevillingstal for finansåret 1981/82.

Regnskabstal	Bevillingstal	Forslag
1.643.833,58	1.825.000	2.020.000

Den forventede udgift i 1981/82 kan specificeres således, idet man tillige har anført regnskabstal og bevillingstal for henholdsvis 1980/81 og 1981/82:

	Regnskabstal 1980/81	Bevillingstal 1981/82	Forslag 1982/83
Vedligeholdelse	1.160.046,56	950.000	1.100.000
Kirkegårde	55.800,00	100.000	75.000

Befordring	27.654,82	50.000	40.000
Forsikring m.m.	21.999,00	25.000	30.000
Nye kirker m.m.	378.333,20	600.000	675.000
Diverse	0,00	10.000	100.000
Ialt	1.643.833,58	1.825.000	2.020.000

Beløbene på de enkelte konti på forslaget for 1982/83 er fastsat på baggrund af regnskabstallet for 1980/81 og forbruget i de første 6 måneder (1/4-30/9-1981) af indeværende finansår.

Der har i finansåret 1981/82 været tale om ret store overskridelser af bevillingen. Overskridelserne må i det væsentligste tilskrives betydelige stigninger på lønninger og materialer. Forslaget for finansåret 1982/83 skal ligeledes vurderes i lyset heraf.

Til de enkelte konti skal iøvrigt bemærkes følgende:

Vedligeholdelse
Af større istandsættelsesarbejder, hvortil der er givet bevilling i indeværende finansår, kan nævnes arbejder på Christianskirkjan i Klaksvik samt Nes, Selatrað, Eiði, Kvívík, Tvøroyri og Porkeri kirker. Hertil kommer istandsættelsesarbejder på Viðareiði, Hvannasund, Mikladalur, Oyndarfjørður, Sjógv, Skálí, Gjógv, Funningur, Kollafjørður, Kirkjubøur, Hestur, Sørvágur, Skopun, Húsavík, Dalur, Hvalba, Fámjin, Hov og Sumba kirker.

Kirkegårde
Beløbet anvendes til tilskud til nye kirkegårdsgærder.

Befordring
Beløbet dækker en fast refusion til kirkeministeriet på ca. 25.000 kr. samt vicebiskoppens rejseudgifter i forbindelse med kirkesyn.

Nye kirker
I finansåret 1982/83 forventes udbetalt rater til nybyggeri/udvidelse ved Glyvrar og Fuglafjørður kirker.

Diverse
Kontoen dækker bl.a. tilskud til færøsk byggede orgler, hvortil der efter fast praksis ydes 20% i tilskud.

Ad § 25-2940: Avskrivingar.

Smbrt. skriv dagfest 27. oktober 1981 frá gjaldstovuni:

Vísandi til skriv landsstýrisins tann 7. september 1981 um uppskot til figgjarløgtingslóg 1982/83 viðvíkjandi *avskrivingum (§ 24-2940)* skal gjaldstovan samsvarandi hjálagda yvirlit meta avskrivingarnar upp á skip, fastar ognir og íløgur figgjað við lánum til

37.700.000,- kr.

Og viðvíkjandi *avdráttum av lánum (§ 24-2930)* verður vist til hjálagda yvirlit yvir landskassans lánuptøkur og rentur og avdráttir í 1982/83.

Eftir hesum fara avdráttirnir at verða 29.000.000,- kr. ella væl minni enn avskrivingarnar, og tessvegna verður

0,00 kr.

til avdráttir av upptiknum lánum.

Avskrivingar av ognum, skipum, íløgum figgjað við lántøkum v.m. fara í 1982/83 ætlandi at verða hesar:

Fastar ognir:

Húsini við Landavegin	1.726,00	
Føroya hægri skúli	370.000,00	
Rektarahúsini í Hoydølum	1.468,31	
Landsbókasavnið (gamla)	3.500,00	
Landsbóka- og skjalasavnið	425.000,00	
Føroya Sjómansskúli	82.000,00	
Gomlu Postmeistarahúsini	27.321,00	
F.M. støðir	391.814,66	
Matr. nr. 951C J.C. Svabosgøta	41.665,00	
Klaksvíkar sjómansskúli	32.831,64	
Heilsufrøðilig Starvsstova	219.872,16	
F.M. støðir (útbygging)	75.048,42	
Ognin Kyrruvík	52.295,20	
Útbygging av flogvøllinum	1.500.000,00	
Gamla apotekið	460.000,00	3.684.542,39

Skip:

Vaktarskipið »Tjaldrið«	1.456.176,53	
Læknabáturin í Klaksvík	54.604,85	
»Smyril«	3.215.384,95	
»Sam«	651.142,20	
»Ritan«	293.636,84	
»Ternan«	305.829,53	
»Barsskor«	45.754,76	
»Ólavur Halgi«	586.616,18	
»Tróndur«	251.090,03	
»Ternan«	1.800.000,00	
»Sildberin«	190.000,00	
»Teistin«	2.000.000,00	
»Nónhamar«	2.100.000,00	
»Magnus Heinason«	2.500.000,00	15.450.235,89

Íløgur fíggjaðar við lánum:

Landssjúkrahúsið (ríkiskassalán)	1.580.980,84	
Klaksvíkar sjúkrahús (ríkiskassalán)	78.111,12	
Vegur Fútaklett/Oyragjógv (Sjóvátrygging)	20.000,00	
Berghol/vegir (60-mill. grunnurin)	4.526.755,14	
Berghol/vegir (Orion-lán)	3.556.131,00	
Berghol/vegir (Westdeutsche Landesb.)	3.872.000,00	
Berghol/vegir (Holland)	3.000.000,00	
Tekniskir skúlar (brævlán)	195.300,00	
Ítróttar- og skúlabygging	1.752.770,68	18.582.048,78
		37.716.827,06

Íløgur fíggjað við lánum í 1981/82 eru ikki við í hesum yvirliti.

Landskassans lánupptøkur				Upprunalig lániupphædd	Restlán 1.4.82	AT GJALDA Í 1982/83 Avdráttir	Rentur
6101	Sjóvinnubankin	nr.	0303161	300.000,00	150.000,00	30.000,00	18.549,63
6104	Sjóvinnubankin	nr.	0307981	639.000,00	63.890,00	63.890,00	4.849,02
6105	Sjóvinnubankin	nr.	0308465	266.000,00	38.403,98	25.594,00	3.864,08
6106	Sjóvinnubankin	nr.	0302912	416.315,00	3.814,78	55.000,00	150.98
6109	Sjóvinnubankin	nr.	0304796	59.785,58	0		
6110	Sjóvinnubankin	nr.	0322840	500.000,00	0		20.648,67
6117	Sjóvinnubankin	nr.	0331963	850.000,00	743.750,00	212.500,00	95.909,43
6118	Sjóvinnubankin	nr.	0332420	1.000.000,00	900.000,00	200.000,00	120.311,60
6130	Føroya Banki	nr.	0307526	300.000,00	155.710,78	33.074,64	17.445,36
6132	Føroya Banki	nr.	0312317	31.288,00	6.367,99	4.607,43	392,57
6133	Føroya Banki	nr.	0301455	639.800,00	183.346,67	90.102,03	15.497,97
6134	Føroya Banki	nr.	0304462	250.000,00	217.957,24	6.341,55	28.358,45
6136	Føroya Banki	nr.	2006507	1.500.000,00	156.620,00	150.000,00	16.580,00
6138	Føroya Banki	nr.	0332989	1.015.958,19	777.429,57	100.529,79	93.470,21
6139	Føroya Banki	nr.	0321200	235.141,31	0	0	0
6143	Føroya Banki	nr.	0363140	2.500.000,00	2.433.826,76	435.266,34	280.733,66
6144	Føroya Banki	nr.	0363426	850.000,00	638.718,32	227.492,80	62.507,20
6145	Føroya Banki	nr.	0364244	700.000,00	653.328,24	127.712,59	74.287,41
6150	Føroya Sparikassi	nr.	0653596	300.000,00	200.000,00	20.000,00	51.800,00
6151	Føroya Sparikassi	nr.	0316468	39.875,00	15.125,00	2.750,00	3.135,00
6152	Føroya Sparikassi	nr.	0653073	317.300,00	156.702,00	12.150,00	41.322,00
6153	Føroya Sparikassi	nr.	0390064	60.000,00	28.000,00	4.000,00	6.000,00
6155	Føroya Sparikassi	nr.	0654398	2.200.000,00	990.000,00	220.000,00	231.000,00
6156	Føroya Sparikassi	nr.	0654134	1.000.000,00	300.000,00	100.000,00	63.000,00
6170	Sjóvátryggingin			2.500.000,00	2.307.377,12	92.696,40	251.330,56

Landskassaus lánupptøkur		Upprunalig lániupphædd	Restlán 1.4.82	AT GJALDA Í 1982-83 Avdráttir	Rentur
6170	Sjóvátryggingin	1.000.000,00	660.812,10	50.320,51	58.365,79
6172	Lívstryggingin	2.500.000,00	2.307.377,12	92.696,40	251.330,56
6173	Sjóvátryggingin	750.000,00	0		
6180	Norðoya Sparikassi 0620364	105.000,00	50.000,00	10.500,00	
6185	Realkreditinstituttið	642.000,00	605.500,00	86.500,00	
6186	Realkreditinstituttið	3.308.000,00	2.894.500,00	413.500,00	
6187	Realkreditinstituttið	1.550.000,00	1.395.000,00	155.000,00	
6193	10% brævlán 76/86	1.625.000,00	542.500,00	108.500,00	54.500,00
	Vexilskuld (Nationalbanken):				
	Føroya Banki (maximum) 10 3-4 %.	50.000.000,00	50.000.000,00		5.375.000,00
	Sjóvinnubankin (maximum) 10 3-4%.	50.000.000,00	50.000.000,00		5.375.000,00
	Íleggingargrunnur fyri Føroyar:				
	20 ymisk lán	181.209.000,00	26.200.000,00	4.955.000,00	1.800.000,00
	Lán upptikin í Føroyum	212.785.732,08	145.776.057,67	8.085.724,48	14.415.340,00
	Lán upptikin uttanlands:				
6202	DFDS	3.000.000,00	2.000.000,00	1.000.000,00	245.000,00
6203	Danm. Skibskreditfond	2.390.000,00	1.930.000,00	460.000,00	145.200,00
6205	Danm. Skibskreditfond	11.400.000,00	3.800.000,00	1.520.000,00	273.600,00
6206	Danm. Skibskreditfond	16.800.000,00	11.760.000,00	3.360.000,00	873.600,00
6207	Danm. Skibskreditfond	15.500.000,00	13.960.000,00	1.540.000,00	1.086.000,00
6208	Danm. Fiskeribank	2.987.990,00	2.545.310,00	442.680,00	244.250,00
6210	Ríkiskassin	17.262.455,57	13.580.404,07	506.367,00	874.629,00
6211	Ríkiskassin	2.137.157,42	439.803,82	81.903,12	35.000,00
6212	Ríkiskassin	2.543.161,00	2.220.241,57	203.452,88	141.009,00

Landskassans lánupptøkur		Upprunalig lániupphædd	Restlán 1.4.82	AT GJALDA Í 1982/83 Avdráttir	Rentur
6170	Sjóvátryggingin	1.000.000,00	660.812,10	50.320,51	58.365,79
6172	Lívstryggingin	2.500.000,00	2.307.377,12	92.696,40	251.330,56
6173	Sjóvátryggingin	750.000,00	0		
6180	Norðoya Sparikassi 0620364	105.000,00	50.000,00	10.500,00	
6185	Realkreditinstituttið	692.000,00	605.500,00	86.500,00	
6186	Realkreditinstituttið	3.300.000,00	2.894.500,00	413.500,00	
6187	Realkreditinstituttið	1.550.000,00	1.395.000,00	155.000,00	
6193	10% brævlán 76/86	1.000.000,00	542.500,00	108.500,00	54.500,00
	Vexilskuld (Nationalbanken):				
	Føroya Banki (maximum) 10 3/4 %	50.000.000,00	50.000.000,00		5.375.000,00
	Sjóvinnubankin (maximum) 10 3/4 %	50.000.000,00	50.000.000,00		5.375.000,00
	Íleggingargrunnur fyri Føroyar:				
	20 ymisk lán	181.209.000,00	26.200.000,00	4.955.000,00	1.800.000,00
	Lán upptikin í Føroyum	212.785.732,00	145.776.057,67	8.085.724,48	14.415.340,00
	Lán upptikin uttanlands:				
6202	DFDS	3.000.000,00	2.000.000,00	1.000.000,00	245.000,00
6203	Danm. Skibskreditfond	2.390.000,00	1.930.000,00	460.000,00	145.200,00
6205	Danm. Skibskreditfond	11.400.000,00	3.800.000,00	1.520.000,00	273.600,00
6206	Danm. Skibskreditfond	16.800.000,00	11.760.000,00	3.360.000,00	873.600,00
6207	Danm. Skibskreditfond	15.500.000,00	13.960.000,00	1.540.000,00	1.086.000,00
6208	Danm. Fiskeribank	2.987.990,00	2.545.310,00	442.680,00	244.250,00
6210	Ríkiskassin	17.262.455,57	13.580.404,07	506.367,00	874.629,00
6211	Ríkiskassin	2.137.157,42	439.803,82	81.903,12	35.000,00
6212	Ríkiskassin	2.543.161,00	2.220.241,57	203.452,88	141.009,00

Landskassans lánuppteku	r	Upprunalig lániupphædd	Restlán 1.4.82	AT GJALDA Í 1982/83 Avdráttir	Rentur
6240	Handelsbanken (kassakreditt)	3.000.000,00	3.000.000,00	?	450.000,00
6301	Exportfinans, Oslo	3.614.000.00	1.042.339,68	564.000,00	75.700,00
6302	Luxembourglánið	30.000.000.00	19.978.400,00	6.147.269.00	1.748.110,00
6304	Westdeutsche Landesbank 3,8 mill DM	12.540.000,00	10.040.000,00	2.500.000,00	965.580,00
6305	Westdeutsche Landesbank 18.0 mill DM	59.400.000,00	59.400.000,00	0,00	4.306.500,00
6306	Algemene Bank Nederland 20.0 mill Hfl	56.400.000,00	56.400.000,00	0,00	5.569.500.00
6309	N.V. Bank Voor Nederland 20.0 mill Ffl	56.507.611,64	56.507.611,64	0,00	6.003.933,74
6310	Exportfinans, Oslo	21.141.233,00	16.603.886,92	2.374.737,33	1.633.384,00
6311	Exportfinans, Oslo	2.698.349,62	2.299.665,00	353.795,07	225.231,00
6312	6 lán agent Privatbanken 9.625 mil. $	58.892.271,89	58.892.271,89	0	9.569.994,00
6313	3 lán agent Handelsbanken 7 mill. $	46.405.800,00	46.405.800,00	0	7.482.935,00
	Lán upptikin uttanlands	424.620.030,14	382.805.733,59	21.054.135,33	41.949.155,00
	Samlað lánteka:				
	Í Føroyum	212.785.731,08	145.776.057,67	8.085.724,48	14.415.340,00
	Uttanlands	424.620.030,14	382.805.733,59	21.054.135,33	41.949.155,00
		637.405.761,22	528.581.791,26	29.139.859,81	56.364.495,00

Viðmerkingar: 1. Byggilán til »Magnus Heinasonar« og rakstrarlán til »Nónhamars« er ikki við í hesum yvirliti.
2. Lán, ið verða uppteikin í 1981/82 (73 milliónir), eru ikki við í yvirlitinum.

Að § 34-4-2 og § 44-5-2: Játtan til ymsar grunnar.

		Játtan 1000 kr.
§ 13-2	Havnagrunnar	40.000
§ 13-3	Lendingar	22.700
§ 13-4	Flogterðir	2.500
§ 13-6	Bergbors- og brúgvagerð	6.000
§ 13-7	Kommunur til asfaltering	6.500
§ 13-8	Byggigrunnur postverksins	5.000
Eftir § 12 verður helvtin av lønarútreiðslunum til deildarljósmøðurnar, sum landskassin ber í fyrstu syftu, afturrindað landinum av ríkinum. Hin helvtin verður við heimild í § 13, smb. »løgtingslóg nr. 25 um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra«, (sum framman fyri er nevnt sum 3)), § 1, býtt í helvt millum landssatus og avvarðandi kommunur (er so statt sama skipan sum við kommunulæknunum, at ríkið ber helvtina, land og kommunur hvør sín fjórðing. § 2 í somu løgtingslóg er um frí hús ella húsaviðbót (sum áður nevnt í løtuni 700 kr. um árið), og sigur annars, at kommunurnar skulu bera telefongjøldini. —

Smb. § 12, stk. 2, »kan der af statskassen ydes delvis refusion af hjemmestyrets udgifter til særlige foranstaltninger til tilvejebringelse af fødselshjælp for områder med ringe fødselsantal, der på grund af deres geografiske beliggenhed ikke har kunnet henføres under den almindelige distriktsinddeling«. Vart verður gjørt við her, at nevndini er ókunnugt, um henda regla nakrantið er nýtt, men um so er, snýr tað seg bert um heilt fáar túsund krónur.

Henda fyriskipan kom í gildi í staðin fyri »anordning af 28. august 1953«.

Smb. tær undir

4) í gildi settu reglur datt burtur skyldan hjá føroysku deildarljósmøðrunum til uttan samsýning at kanna barnakonur, men ásett varð fast gjald fyri hvørja av teimum 7 kanningunum hjá ljósmøðrunum, sum nú komu at standa øllum føroyskum barnakonum í boði (umframt tær 3 kanningarnar hjá lækna).

Vart verður gjørt við, at í »indenrigsministeriets bekendtgørelse af 27. april 1960 for Færøerne om svangerskabshygiejne« stendur beinleiðis í § 1, 1. stk., at »hvor forholdene taler derfor, **kan også sidstnævnte undersøgelser (t.e. ljósmóðurkanningarnar av barnakonum) efter indenrigsministerens nærmere bestemmelse foretages af en læge,** »ti hetta kann fáa almiklan týdning, tá ið metast skal um kanningarnar av barnakonum eftir eini nýskipan, har einans verða ljósmøður á teimum 3 sjúkrahúsunum.

Í somu kunngerð § 1. 2. stk., verður boðin **ókeypis fluttningur** av barnakonuni (tó ongantíð fyri minni enn 2 km) til lækna ella ljósmóður, ella um neyðugt at fáa tey til sín til ta sera umráðandi kanningina, tí ið konan hevur verið við barn í 37-38 vikur. Treytin er tó, at barnakonan nýtir vanligan ferðabil ella -bát, tá ið tað er gjørligt. Hesar útreiðslur leggur landskassin út, men ríkið afturrindar tær fult. Í Danmark verða ikki aðrar fluttningsútreiðslur afturgoldnar barnakonuni enn tann nevnda, men í Føroyum samtykti løgtingið í 1968 **5)**, sum í § 1 sigur, at »eftir reglum, sum landsstýrið fyrisetur, **verður goldið úr landskassanum allar ferðaútreiðslur** til kannan hjá lækna ella jarðamóðir fyri kvinnu við barn, sum **búgva í bygdum, har ikki lækni ella jarðamóðir** er«.

Í Danmark er komin í gildi nýggj lóg øllum hesum viðvíkjandi: »Lov nr. 282 af 7. juni 1972 om svangerskabshygiejne og fødselshjælp«, og varð henda lóg av landsstýrinum send landslæknanum til ummælis, men svaraði hann í skrivi, dagfest 7. februar 1973 (j. nr. 81-1-72), landsstýrinum aftur, at hann ikki kundi mæla til, at nýggja danska lógin varð sett í gildi fyri Føroyar, men at álagt varð hesi núsitandi nevnd at koma við uppskoti um eina nýskipan fyri Føroyar.

Samstundis er nevndini kunnugt, at føroyska ljósmóðurfelagið sjálvt arbeiðir við lønar- og fritíðarspurningum ljósmøðra eins og við húsa- og viðtaluumstøðunum (rúm til barnakonukanningar), ið summastaðni eru ógvuliga vánaligar. Hin 2. februar 1973 varð sett serlig nevnd við limum frá landsstýri, ríkisumboði og ljósmøðrafelagnum til at viðgera hesar spurningar, men um tann nevndin hevur hildið

fund og er komin nakað áleiðis, er okkum ókunnugt, men ivaleyst hugsar hon bert um broytingar, serliga føtarliga, av núverandi skipan — ikki um nakra nýskipan.

3. Viðurskiftini í løtuni.

Ljósmóðurskipanin í Føroyum er í dag sovorðin, at bara ein lítil partur av ljósmøðrunum hevur fullan arbeiðsdag, nógvar ljósmøður hava lítið og einki at gera. Og varð ikki kanningin av barnakonum komin í lag — heilt eftir donskum mynstri, og fyri hetta arbeiði fáa ljósmøðurnar eykagjald eftir donskum gjaldsreglum — ber til at siga, at summar teirra høvdu als einki ella bara heilt lítið arbeiði haft hóast fulla løn. Eisini hevur tað í mong, mong ár verið ómetaliga ringt at fingið størvini úti á bygd sett. Til dømis hevur eingin ljósmóður fingist til Funnings deild, síðani táverandi deildarljósmóður har í 1956 flutti til Havnar, giftist og síðani hevur starvast í Havn sum privatpraktiserandi (starvið í Funningi nú niðurlagt, tí eingin umsøkjari fekst). Onnur størv eru bara sett, tí at maðurin hevur fingið fast starv í bygdini, til dømis Eiðis og Viðareiðis ljósmóðurdømi (har neyðugt var eins og í Fuglafjarðar ljósmøðurdømi at loyva bústaðin skiftan til ávikavist Norðdepli og Lorvik, skuldi nøkur ljósmóður fáast). Uppaftur aðrastaðni er tað heilt vist, at ljósmóður hevði ikki verið í dag, var hon ikki gift hagar fyri mongum árum síðani. Á Tvøroyri hevur eingin ljósmóðir fingist síðani 1969. Talið á privat praktiserandi ljósmøðrum á bygd, sum í mong ár vóru 2, er nú einki, og av privat praktiserandi eru eftir bara 2 (í Havn), har onnur hevur boðað frá, at hon fer at leggja frá sær. 2 ungar giftar ljósmøður eru í Føroyum, men hvørgin arbeiðir. Ikki er at bjóða til, hvørki við peningaligum viðbótum ella øðrum lættum at fáa ljósmóður út í tey flestu bygdastørvini. Eingin man vita hetta betur enn núsitandi landslæknin, sum í 24 ár í hvørjum einstokum føri hevur roynt at leita upp aftur tey ungu, føroysku konufólkini, sum hava fingið ljósmóðurútbúgving, men sum hvørva í útheiminum og tað minni enn so alttíð, tí tær verða giftar burturi.

Meginatvoldin í hesum er tann, at seinnu árini hava flestar konur — sum allar ljósmøður málbera seg — »vilja sloppið inn á sjúkrahús at eiga«. Hetta er ein sinnalagsbroyting, sum heilsuliga er at gleðast um, av tí at barnsburðirnir tá sjálvandi á allan hátt vera tryggari bæði fyri mammu og barn. Tær grundir, sum av onkrum hava verið førdar fram ímóti hesum (t.d. vandin fyri sjúkrahússmittu og minni bróstageving) hava í hesum sambandi ongan týdning og eru illa umhugsaðar samanborið við tann vanda, ið kann standast av, at eingin uttan ljósmóðirin og kanska ein einsamallur lækni á bygd eru hjá.

Til at vísa hesa stórbroyting skal bara verða nevnt, at í 1878, tá ið fyrsta ljósmóðurlógin kom, vórðu settar 25 ljósmøður, og allar konur áttu heima. Uml. 1950 áttu bara út við 1/3 av øllum barnakonum á sjúkrahúsi, í 1967 79%, men í 1972 91% av øllum barnakonum (738 av 808 konum).

Taka vit árið 1972, var talið á barnakonum í teimum ymisku deildunum og á konum úr hesum deildum, sum áttu heima og á sjúkrahúsi, tað, ið sæst á 15. talvu. Áðrenn farið verður undir talvuna, má verða viðmerkt, at mørkini deildanna

millum eru ikki longur so skillig sum fyrr orsakað av teimum nógv batnandi samferðsluliknindunum. Summastaðni leita konurnar allar vegir, sum best ber til, har tær steppa. Úr hesi talvu og viðmerkingunum til hennara siggjast nú heilt skilligá ymisk fyribrigdi, sum eru av stórum týdningi viðvíkjandi framtíðarætlanini (eisini og serliga ein meting kostnaðinum viðvíkjandi):

Bara 9% av øllum barnakonum í Føroyum eiga heima — og við bara 5 barnakonum úr øllum hinum Føroyum sum undanløkum (1 av Eiði, 1 úr Klaksvík, 2 av Sandi og 1 í allari Suðuroynni, sum av onkrari serligari grund hava verið heima við hús), eru allar hesar barnakonur at finna í Eysturoynni (31 av 113 barnakonum í Runavíkar ljósmóðurdeild og 24 av 78 í Fuglafjarðar ljósmóðurdeild, í báðum deildum umt. 27-30% av konunum ella undir 1/3), nakrar fáar í Vágoynni (10 av 52 t.e. umt. 20%). Allar aðrastaðni í landinum leita allar barnakonur til sjúkrahús at eiga, eitt tyndi ið sum áður nevnt **læknaliga** bara er at gleðast um, tá ið hugsað verður um trygdina bæði hjá mammu og barni. Hvi hetta undantak er í Eysturoy (og í Vágum), kann hava fleiri atvoldir: Gamalur siður er at eiga heima í Eysturoynni og í Vágum, kanska tí einki sjúkrahús er í oynni, yvirhøvur í flestum førum eru kanska í Eysturoy og í Vágum hampuliga góð húsaviðurskifti og høgligt at fáa til sín lækna og ljósmóður, men allarhelst er mesta atvoldin tann, at ljósmøðurnar í Runavík og í Fuglafirði (Lorvík) heldur vilja hava konurnar at verða heima. Ivaleyst er tað einki ar siga til hetta, sum lønarviðurskiftini eru í løtuni, har allar deildarljósmøðurnar umframt fasta løn (sæst á 16. og 17. talvu) eisini taka fyri hvønn barnsburð, tær hava undir hond. Tí hava tær helst lítlan hug til at lata eina konu frá sær, tá ið hon skal eiga, uttan at tað er øllum greitt framman undan, at tað er neyðugt orsakað av onkrum sjúkligum hjá mammu ella fostri. Men umframt hesar inntøkur hava sum nevnt allar deildarljósmøður nú líkindi til eina týðandi inntøku av barnakonukanningunum (18. talva).

Sum tað skilliga sæst av 15. talvu, er talið á barnakonum í flest øllum deildum nógv, nógv størri enn talið á konum, sum ljósmóðurin hevur sitið hjá, tá ið tær áttu (hetta er so í øllum deildum uttan í Havnardeildunum og Viðareiðis deild, í Suðuroy er talið sjálvandi at siga tað sama). Spurningurin er nú, um allar hesar barnakonur, ið leita inn á sjúkrahús at eiga, og tí framman undan í flestum førum hava vent sær til eina ljósmóður í sjúkrahúsbygdini, meðan tær eru við barn, eisini ganga til kanningar hjá hesi uttandeildar ljósmóður, ella ganga hjá ljósmóðurini í tí deild, har tær búgva. So frægt sum tað ber til at fáa hetta upplýst, er tað bert í heilt fáum førum, at barnakona av bygd leitar til javnar kanningar í Havn ella í Klaksvík. Hetta fæst prógv fyri, bera vit saman tølini fyri inntøkur av barnakonukanningum, sum sæst á 18. talvu, við ta inntøku, sum hvør deildarljósmóður kundi vunnið sær av konunum í egnu deild sini, um hesar konur allar í fullan mun leitaðu til hennara. Í 1972 hevði ein deildarljósmóður fyri hvørja barnakonu, møtti hon til allar kanningar, kunna haft eina inntøku uppá 110-120 kr. Vit siggja, at til dømis deildarljósmóðurin í Runavík kundi haft vunnið sær uml. 13.000 kr. (113 x 115 kr.), men at

hon bara hevur fingið 6.209,93 kr., og deildarljósmóðirin í Fuglafirði (Lorvik) kundi haft vunnið sær 9.000 kr. (78 x 115 kr.), men bara hevur fingið 5.106,59 kr.

Sjálvandi er at hava í huga, at eyðvitað fara ikki allar konur til allar kanningar, og sum vera man fara konur ofta onkra kanning til la deildarljósmóður, sum á sjúkrahúsi skal vera hjá henni, tá ið hon eigur, men taka vit ljósmøðurnar í Havn, so kundu tær tilsamans, høvdu allar konur, tær sótu hjá, eisini gingið til kanningar hjá teimum — vunnið út við 60.000 kr. (516 x 115 kr.), men hava bara fingið útgoldið út við 40.000 kr., men hetta er tó væl meira enn tað, ið tær einans kundu vunnið av barnakonum í Havn og um Havnarleiðina (263 x 115 kr. = 30.245 kr.).

Hetta bendir tann vegin — sum eisini ljósmøðurnar í Havn siga seg møta javnan — at barnakonurnar úr hesum báðum nevndu økjum ikki sjáldan organtið ella bert heilt fáar ferðir hava verið hjá egnu ljósmóður sinari til kanningar. Arvoldin er tann, at barnakonan, sum konur aðrastaðni í Føroyum fyri trygdar- og aðrar sakir vil sleppa inn á sjúkrahús, men hetta hektur ljósmóðirin ikki verða neyðugt, tí eink sjúkligt tykist vera ella er at finna. Barnakonan fer tá — so hon skal ikki vera bundin at eiga heima ella tí hon vil ikki særa ljósmóðurina ella gera hana firtna — organtið aftur til kanningar, men vendir sær beinleiðis til ljósmóður í Havn, tá ið líður at teirri tið, hon skal eiga. Men í hesum førum hevur hon alla hesa longu tið ikki verið undir ljósmóðurhond (tó allarhelst hjá lækna) og kemur tá á landssjúkrahúsið meira og minni ókannað. Av hesum **kann** standast (og hevur staðist) skaði bæði hjá mannnu og barni, eru tær fyri óhappinum. Skuldi hendan tnannagongd ført við sær, at konan fer ikki til lækna fyrrenn til allarseinast, má eisini verða nevndur vandin (umframt rhesus-vandin) fyri viðføddum syfilisi, ið heilt kann oyðileggja eitt fostur. Henda sjúka hevur vundið upp á seg alla aðra staðni í heiminum, og hin nú stóri smittuvandin úr Grønlandi ma verða havdur í huga. Syfilis hevur fyrr verið sjáldsom sjúka í Føroyum, men í 1972 vóru 3 tilburðir og í 1973 hava longu nú (í oktober) verið 3.

Aðrar deildir eru, har barnakonurnar koma at siga fult kannaðar av bygd til ljósmóður í Havn og eiga á landssjúkrahúsinum, og hildið verður, at meginatvoldin í hesum er, at ljósmøðurnar ikki sjálvar eggja teimum til at eiga heima. Tað sama er at siga um Norðoyggjar og Suðuroy.

Tá ið saman um kemur er tað so — smb. 15. talvu — at á Fiði, á Sandi, í Vestmanna, í Vágunum, í Norðdepli og á Syðradali (K) er einki ella litið og einki at gera, tað ið føðingum viðvíkur, og er bert ella kundi verið eitt sindur at gjørt, tá ið barnakonukanningarnar verða taldar uppí. Í Runavík og Fuglafirði eru enn eitt vist tal av føðingum (hóast tað er ikki stórt), men har eru ikki barnakonukanningar og kundu verið nógv fleiri. Hitt gamla, rættuliga ljósmóðurarbeiði, at sita hjá konuni og hjálpa henni, tá ið hon eigur, fer nú á døgum at siga bert fram á teimum 3 sjúkrahúsunum.

Og eftirynskjandi er, at allar konur í Føroyum eiga har. At siga allar konur vilja hetta sjálvar, og læknaliga og heilsuliga eru bara grundir fyri og sum frammanfyri nevnt ongar ímóti. Sjúkrahúsini eru, tað ið seingjartalið viðvíkur, øll før fyri at taka

ímóti hesum konum og eiga eisini altíð at vera tað læknaliga. Verður heilsulagið í Føroyum útbygt sum skotið upp av nevndini við fleiri kommunulæknum og heimasjúkrasystrum um alt landið, dugir nevndin ikki at skilja, at kommunulæknar og heimasjúkrasystrar (saman við teimum 3 sjúkrahúsunum) ikki væl betri kunnu gera barnakonukanningarnar enn tað, ið ljósmøðurnar kunnu. Prógvgrundir móti tílíkari skipan kunnu einans stava frá vanabundnari hugsan og/ella yrkisfelagspolitikki.

4. Útreiðslurnar til ljósmóðurskipanina, sum hon er í dag, siggjast fyri 1972 fyri ein part av 18. talvu (sum kortini má verða samanborin við 17. talvu, ið sýnir lønarlagið hin 1. apríl 1973).

Tilsamans er í føstum lønum goldið 295.049,98 kr. (men høvdu 2 ljósmøður verið alt árið í Klaksvík, og starvið á Tvøroyri verið sett, hevði talið vaksið við uml. 33.300 kr. til uml. 328.350 kr.), fyri barnakonukanningar tilsamans 78.637,29 kr., tilsamans 373.687,27 kr. (vóru í Klaksvík og Tvøroyri við so uml. 407.000 kr.). — Men hetta er ikki alt talið. Kommunurnar lata umframt telefongjald (talið er nevndini ókunnugt, men hevur ikki nógv at týða í hesum sambandi), eisini húsastuðning, og verður hann mettur tilsamans at vera 700 kr. x 14 = 9.800 kr. Men umframt løn og fyri barnakonukanningar hava allar ljósmøður (bæði deildar- og privatpraktiserandi sum nevnt undir lógarreglunum) rætt til at taka frá barnakonunum sjálvum, tá ið tær hava átt, eitt vist gjald, sum óvist við hvørjum rætti — er sett til uml. 1% av — ið hvussu er skattskyldugu — inntøkuni. Johs. Thomsen, skattastjóri, sum man vera kønastur í tílíkum metingum her á landi, hevur gjørt landslæknanum tann beina at meta um hesi viðurskifti. Hjá uml. 9.000 skattagjaldarum í 1972 — mest ung og yngri fólk, har konurnar eru á barnburði — liggur skattskylduga inntøkan millum 12.000 og 34.000 kr., í meðal *22.200 kr.* (tá er samstatting ikki tald uppi). Hetta samsvarar við eini fullari inntøku upp á uml. 34.-35.000 kr. Fyri 808 barnakonur er tí líkt til, at ljósmøðurnar í øllum Føroyum í 1972 hava fingið goldið í hondina í hvussu er uml. 222 x 808 = *179.376 kr.* (Hægsta hugsandi talið, eru ljósmøður, ið taka av fullari inntøku, verður 345 x 808 = 278.760 kr. Men hetta tal man vera heilt óhugsandi, og nýtir nevndin tí í komandi metingum sínum lægra talið). Frá sjúkrakassunum fáa so barnakonurnar (eru tær limir) afturgoldið móti at vísa kvittan frá ljósmóðurini 125 kr. Í 1972 hava sjúkrakassarnir goldið tilsamans 88.750 kr. Men tað veruliga gjaldið, sum barnakonan sjálv hevur latið ljósmóðurini, er ilt at fáa upplýst. Áðurnevndi formaður í føroyska ljósmóðurfelagnum í mong ár hevur sagt landslæknanum frá, at hevur ljósmóðurin onga kvittan at vísa fram í teimum førum, har ein kona einki vil gjalda, sýtir sjúkrakassin fyri at gjalda ljósmóðurini beinleiðis tær 125 kr. — men metir hon hetta tapið onguntíð at vera meira enn uml. 3% av øllum konum, kanska minni.

Aftrat omanfyri nevndu tølum mugu so leggjast útreiðslurnar, sum standast av áðurnevndu løgtingslóg frá 1968. Landsstýrið sigur hesar útreiðslur í 1971/72 (fíggjarlógin § 12, 14) til ferðaútreiðslur hjá barnakonum, t.e. til barnakonukanningar á bygd, har hvørki er lækni ella ljósmóðir, at hava verið 11.375,50 kr.

(fyri fíggjarárið 1973/74 eru settar 15.000 kr. á fíggjarlógina). Til konur úr avbygdum og útoyggjum, sum nakað frammanundan fóru inn í sjúkrahúsbygd at eiga, eru í 1971/72 latnar 1.705 kr. (á fíggjarlógini 1973/74 eru settar 3.000 kr.). Inntøkur ljósmøðra í 1972 (vóru øll størv sett alt árið) høvdu tí verið uml. 596.163 kr., og allar útreiðslur samfelagsins (sjálvandi ikki uppíroknað kostnaðurin at liggja á sjúkrahúsi og tað, ið hitt almenna letur í útreiðslum til læknakanningarnar av barnakonum) eru, sum tað sæst av uppgerðini niðanfyri 614.948 kr. Til amboð, tól o.s.fr., ið koma at verða væl færri eftir nýskipanini, eru latin nøkur fá túsund. Váttaðar av landslæknanum vórðu í 1972 smb. »anordning af 25. oktober 1962 om distriktsjordemødre på Færøerne« § 6 rokningar upp á tilsamans 5.704,55 kr. og higartil (oktober) fyri 1973 út við 4.000 kr., men ávikavist uml. 4.500 kr. og 3.000 kr. eru farnar til tær ljósmøður, ið hava konurnar at eiga heima við hús. Eitt er hesi ár farið til ljósmóðurtasku við amboðum í.

Lønir	328.350 kr.	
Barnakonukanningar	78.637 kr.	
Húsaviðbót	9.800 kr.	
Goldið í hondina (uppiroknað afturgoldið frá sjúkrakassum í mesta lagi 100.000 kr.)	179.376 kr.	596.163 kr.
Ferðaútreiðslur til barnakonukanningar	11.375 kr.	
Konur úr avbygdum	1.705 kr.	13.080 kr.
Til amboð, tól, sóttreinskandi evni o.t.		5.705 kr.
Tilsamans		614.948 kr.

Tað er tí hetta tal, 615.000 kr., ið — ljósmøðrunum viðvikjandi — má verða borið saman við útreiðslurnar av eini nýskipan.

Núgaldandi ljósmóðurskipan tykist nevndini at vera heilt burturoldað, óvirkin og upp á seg dýr (sum tað sæst av uppskotinum til nýskipanina) – í mun til tað lítla gagn ið tær allarfleslu ljósmøðurnar gera. Skipanin eigur at verða avtikin, so skjótt sum til ber.

5. Nýskipan av ljósmóðurviðurskiftunum í Føroyum.

Staðin fyri núgaldandi skipan eiga ljósmøðurnar, sum tað almenna setir, at verða settar við og arbeiða á teimum 3 sjúkrahúsunum og fáa fasta løn og eftirløn, hóskandi vaktar- og fritíðarskipan (men skyldu til í neyðsend at fara út á bygd, skuldi tað onkra sjáldna ferð verið neyðugt), umframt skyldu til á sjúkrahúsunum at hava fasta, ókeypis viðtalu fyri barnakonur. Og metir tann nevndin, ið seinast í hesum uppskoti verður mælt til at seta, tað neyðugt, eiga tær eisini at hava skyldu til ókeypis fasta viðtalu í størstu bygdunum. Nevndin heldur, at á landssjúkrahúsinum

eiga at vera 1 yvirljósmóður og 4 fastar ljósmøður, á Norðoya sjúkrahúsi og á Suðuroyar sjúkrahúsi ávíkavist 3 og 2, tilsamans 10 ljósmøður settar av tí almenna móti í løtuni 14 deildarljósmóðurstørvum, har seinnu árini ljósmóður bara hevur fingist til tey 13 hóast sera nógvar og ymsar royndir.

Nevnt varð frammanfyri, at tað átti ikki at koma føroysku ljósmøðrunum til ógagns, at tær stóðu einsamallar og ikki hingu uppi í donskum meginfelagi, tvørturímóti. Fyri starvsfelagar teirra í Danmørk er nú komin í gildi sáttmáli frá 5. apríl 1972 (»overenskomst vedrørende løn- og arbejdsforhold for jordemødre«, góðtikin av »Amtsrådsforeningen i Danmark, Københavns hospitalsvæsen og Den almindelige danske jordemoderforening«), sí lønarviðurskiftunum viðvíkjandi fylgiskjal 9. Í hesum sáttmála stendur eisini um onkra javningarviðbót av ymiskum slagi og dýrtíðarviðbót sum hjá tænastumonnum (men tað er ikki øðrvísi enn fyri deildarljósmøður eftir núgaldandi skipan), um fastar eftirlønarreglur, frían yrkisbúnað, frídaga- og fritíðarreglur (t.e. fast vaktarhald), meðal arbeiðstíð upp á 41 3/4 tímar og um eykagjald fyri yvirtíð, kvøld- og náttararbeiði (sum kortini kann verða afturrintað sum frídagar) o.s.fr. Tær hava ongan rætt til íbúð, heldur ikki til kosturhald á sjúkrahúsunum. Teimum kann verða álagt — uttan eykagjald — skylda til ókeypis í arbeiðstíð at halda viðtalu úti á bygd (flutningsútreiðslur mugu tá sjálvandi verða teimum afturgoldnar, ella tær nýta bil hjá sjúkrahúsunum).

Eisini er gjørligt at seta ljósmøður við lutvísari arbeiðstíð ella tímaløntar ljósmøður, men nevndin metir hetta fara at verða dýrari loysn. Tó, hetta má sjálvandi sjúkrahúsfyrisitingin gera av. Lagt skal verð aftrat, tá ið hugsað verður um sjúkrasystranæmingar og tað, sum nevnt er í tí partinum av hesum nevndaráliti, ið snýr seg um sjúkra- og heilsusystrar — at hesum ljósmøðrum eisini (smb. sáttmálan § 12) kann verða áløgd skylda ókeypis í arbeiðstíð at læra frá sær.

Útreiðslurnar av teirri nýskipan, sum nevndin skjýtur upp, kunnu metast soleiðis (smb. fylgiskjal 8):

Á landssjúkrahúsinum:	**lønir**	
1 yvirljósmóður	u.l.	54.000 kr.
4 ljósmøður á 45.000 kr.	u.l.	180.000 kr.
	u.l.	234.000 kr.
Norðoya sjúkrahús:		
3 ljósmøður	u.l.	135.000 kr.
Suðuroyar sjúkrahús:		
2 ljósmøður	u.l.	90.000 kr.
Tilsamans	u.l.	459.000 kr.

Landslæknin hevur loyvt sær at spyrja formansskapin í »Den alm. danske jordemoderforening« fingið tað svar, at tílík skipan hevði verið góðtikin í Danmark.

Útreiðslurnar hjá føroysku sjúkrahúsunum í aðrar mátar verða ikki størri enn í dag, har jú at siga allar konur longu eiga, og sjúkrahúsini lata alt, ið ljósmøður nýta. Kostnaðurin av barnakonukanningum á sjúkrahúsunum sæst ikki aftur í ti frammanundan stóra rakstrinum (smb. tær frammanfyri nevndu av landslæknanum váltaður útreiðslurnar til hetta endamál upp á 5.705 kr. í 1972).

Ein í allar mátar betri nýskipan, bæði fyri ljósmøðurnar og fyri barnakonurnar, kemur so statt at kosta uml. *460.000 kr.* mótvegis teimum 615.000 kr., sum viðurskiftini í dag kosta samfelagnum. Og tá er ikki at gloyma, at hvørki barnakonan ella sjúkrakassarnir (ella ein komandi sjúkratrygging) fáa nakað at gjalda fyri sjálvan barnsburðin.

Sjálvandi hevur tað almennu skyldu mótvegis teimum ljósmøðrum, sum núta sita í føstum starvi. Tær eru:

Aldur ljósmøðra

1.	Runavík	30 ár
2.	Fuglafjørður	33 ár
3.	Klaksvík II	39 ár
4.	Fiði	40 ár
5.	Viðareiði	44 ár
6.	Tórshavn II	53 ár
7.	Miðvági	54 ár
8.	Tórshavn I	56 ár
9.	Sandi	60 ár
10.	Syðradalur (K)	63 ár
11.	Klaksvík I	63 ár
12.	Vági	64 ár
13.	Vestmanna	67 ár

Men tað liggur so væl fyri, at øllum uttan tveimum kann verða bjóðað fast starv við sjúkrahúsini. Hesar báðar verða helst deildarljósmóðurin í Vágum (nr. 7) og á Sandi (nr. 9), sum valla leggja í at flyta, og sum eru ávikavist 54 og 60 ár. Deildarljósmóðurin í Vestmanna (nr. 13) kann fara frá við eftirløn vegna aldur.

Fyrisitingin má sjálvandi gera av, um deildarljósmøðurnar á Sandi og í Miðvági skulu fara frá við biðingar- ella eftirløn, ella onkursvegna verða drignar upp í heilsuliga arbeiði á staðnum (t.d. sum hjálp hjá læknunum). Men hóast tær vórðu sitandi við fullari løn (tilsamans út við 53.000 kr., smb. 17. talvu), so sæst, at nýskipanin við teimum uppíroknað kortini hevði kostað samfelagnum 102.000 kr. minni enn ljósmóðurviðurskiftini í dag.

Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at í Føroyum er bara eftir 1 privat praktiserandi ljósmóður (í Havn, 50 ár).

At enda skjýtur nevndin upp, at útreiðslurnar til nýggju ljósmóðurskipanina verða bornar av føroysku sjúkrahúsunum, sum ríkið vanliga afturrindar umt. 50% av øllum raksturi.

Í Danmørk kom hin 7. juni 1972 »lov nr. 282 om svangerskabshygiejne og fødselshjælp«, sum kom í gildi hin 1. apríl 1973, og sum samstundis tekur av gomlu lógirnar um deildarljósmøður og um kanning av barnakonum.

Sambært hesa lóg er meginreglan tann, at øll barnakonuhjálp er ókeypis fyri konurnar sjálvar, allar konur kunna vilja tær - - eina á sjúkrahúsi ella øðrum almennum stovni, og ljósmøðurnar fáa einki eyka longur fyri kanningarnar av barnakonum (tað fáa afturímóti læknarnir framvegis), men hetta arbeiði er rokniað upp í tað virkisøki, ið tær fáa løn fyri. Skilligt er tí, at uppskot nevndarinnar fyri Føroyar liggur heilt á sama bógvi sum lógin í Danmørk — men samstundis má verða sagt, at ikki er gjørligt uttan broytingar at seta donsku skipanina í gildi her. Neyðugt er at laga seg eftir viðurskiftunum, umstøðunum og fyritreytunum her á landi.

Verður tikið við tí uppskoti, sum mælt verður til í hesum nevndaráliti, skjýtur henda nevndin upp, at ein lítil nevnd verður sett beinanvegin, har ið hvussu er yvirlæknin fyri deildina í nærfrøði og kvinnusjúkum við landssjúkrahúsið og fyristøðukvinnan har umframt umboð fyri ljósmøður og kommunulæknar sita, og at hesa nevnd fær setning skjótast gjørligt at gera uppskot til reglur øllum hesum spurningum viðvíkjandi (reglugerðir og fyriskipanir viðvíkjandi kanningum av barnakonum, bæði á sjúkrahúsum og á bygd, umframt samarbeiðið við kommunulæknar, heimasjúkra og heilsusystrar og setan og lønarlagi hjá ljósmøðrunum eftir nýskipanini).

6. ÚRTAK

viðvíkjandi ljósmøðrunum.

Nevndin hevur í álitinum frammanfyri givið eitt yvirlit yvir núgaldandi reglur viðvíkjandi ljósmøðrunum og rættarstøðu teirra. Tá ið fyrsta lógin um ljósmøður kom í 1878, vórðu Føroyar býttar sundur í 25 ljósmóðurdeildir. Í 1920 komu við nýggjari lóg 28 deildir, men við lógini frá 1953 bert 18 deildir (og vóru tá umframt 6 privat praktiserandi ljósmøður, t.e. tilsamans 24). Men so líðandi er hetta tal, orsakað av at ljósmøður so illa fingust at seta seg niður úti á bygd, og barnakonur meira og meira leitaðu inn á sjúkrahúsini at eiga undir í allar mátar tryggum korum, minkað niður í núverandi talið 14 deildarljósmøður (har tað eina starvið í fleiri ár hevur verið ósett) og 2 (um stutta tíð bara ein) privatum ljósmøðrum (smb. 15. talvu).

Í 1972 áttu bara 9% av øllum barnakonum heima, og víst verður, at tær allarflestu av hesum koma úr 2 deildum í Eysturoynni, har ljósmøðurnar andøva ímóti, at tær eiga á sjúkrabúsi. Víst verður, at henda mótstøða *kann* verða til skaða fyri mammu og barn.

Lønarútreiðslur og onnur inntøkulikindi ljósmøðra eru at siggja á 16., 17. og 18. talvu. Tilsamans mugu ljósmøðurnar (13 deildar- og 2 privatar ljósmøður) í Føroyum í 1972 ætlast at hava vunnið í reiðum peningi *596.163 kr.*, hóast tær hava ógvuliga lítið at gera fyri hesar inntøkur. Útreiðslurnar, ið av núverandi viðurskiftum hava staðist, hava tilsamans verið umk. 615.000 kr. (smb. 79. bls.).

Skotin verður tí upp ein nýskipan, har bara fastar ljósmøður verða á teimum 3 sjúkrahúsunum (5 á landssjúkrahúsinum, 3 á Norðoya sjúkrahúsi og 2 á Suðuroyar sjúkrahúsi), og sagt verður frá, hvussu kanningarnar av barnakonum tá samstundis kunnu fara fram á sjúkrahúsum og úti á bygd. Eftir hesi skipan verða útreiðslurnar hjá teimum 3 sjúkrahúsunum tilsamans umk. *460.000 kr.* (smb. 81. bls.), har tíkið ætlast at afturrinda helvtina. Allar barnakonukanningar verða framvegis ókeypis, og hitt almenna fær einki eyka at gjalda til ljósmøðurnar fyri hesar kanningar, og barnakonurnar (heldur ikki sjúkrakassarnir ella ein komandi sjúkratrygging) fáa nakað — sum tær nú gera — at gjalda ljósmøðrunum fyri sjálvan barnsburðin.

Orsakað av at nýskipanin fyri allar partar verður so nógv dýrari enn núverandi viðurskifti, verður mælt til, at nýskipanin verður sett í gildi longu frá 1. apríl 1974.

Dentur verður lagdur á, at sett verður beinanvegin ein minni nevnd, ið so skjótt sum til ber skal gera tær reglur, ið galda skulu fyri nýskipanina, og at tingingar beinanvegin verða tiknar upp við sjúkrahúsfyrisitingina.

Hóast tað í hesum sambandi kann tykjast lítilsvert at nevna, leggur landslæknin nógvan dent á, at ljósmóðurgerðabøkurnar verða varðveittar og ikki avtiknar her í Føroyum (eins og ætlanin er at gera í Danmørk), helst í nakað broyttum og umbøttum skapi, ið betur hóskar til føroysk viðurskifti. Tí hesar gerðabøkur eru, ikki bara læknaliga, men eisini á so mangan annan hátt her hjá okkum eitt keldutilfar, sum einans hann, ið fingist hevur við tað nú í meira enn eina fjórðingsøld, rættuliga man duga at meta um.

Skjal til løgtingsmál nr. 91: SKJAL 11

SKIPAN MILLUM FØROYAR OG NOREG UM SÍNÁMILLUM FISKIRÆTTINDI Í 1982.

Protokoll frá drøftelser mellom Norske og Færøyske myndigheter i Bergen 29. januar 1982 om gjeusidige fiskerettigheder i 1982

Den 29. januar 1982 drøftet en færøysk delegasjon ledet av Lagmann Pauli Ellefsen og en norsk delegasjon ledet af Fiskeridirektør Hallstein Rasmussen, færøysk fiske i Norges fiskerisoner og norsk fiske i færøysk fiskerisone i 1982. Møtet var en fortsettelse av tidligere møter i Bergen og i København. Drøftelsene var basert på avtalen om gjensidige fiskerirettigheter undertegnet 7. februar 1979.

De to partenes delegasjoner fremgår av vedlegget (./.).

Partene ble enige om:

1. Færøysk fiske i Norges fiskerisoner.

A. I den økonomiske sone nord for 62° n.br.

1. 3.300 tonn torsk,
2. 3.900 tonn torsk overført fra den færøyske kvote i USSR's fiskerisone.
3. 500 tonn hyse (kuller) som bifangst,
4. 1.000 tonn andre arter (uer, (rødfisk), sei, blåkveite (hellefisk)).
   Det er bare tillatt å ta inntil 500 tonn av hver art.
   Kvoten skal også omfatte bifangster i andre fiskerier.
5. 15.000 tonn lodde, herav 5.000 tonn vinterlodde.
6. 4.000 tonn makrell som prøvefiske,
7. Inntil 5.000 tonn kolmule som prøvefiske i et nærmere avgrenset område.

Den færøyske part vil innen 15. september orientere den norske part om eventuell udisponert loddekvote med sikte på at ubenyttet kvote kan fiskes av norske fiskere. Fiske etter lodde kann ikke finne sted i de perioder hvor slikt fiske er forbudt for norske fiskere.

50% av de enkelte færøyske torske- og loddefangster i et tilstøtende område i Barentshavet som grenser opp til Norges og USSR's fastlandskyster skal avregnes på kvotene tildelt av Norge, for torsk for de første 2.000 tonns vedkommende, og for lodde for de første 10.000 tonns vedkommende.

B. I fiskerivernsonen ved Svalbard.

1. 500 tonn torsk,
2. 200 tonn andre arter (vesentlig uer og blåkveite)

Færøysk loddefiske i fiskevernsonen ved Svalbard er begrenset til kvoten nevnt under IA-5.

C. I den økonomiske sonen sør for 62° n.br.

1. 20.000 tonn øyepål, tobis, kolmule og brisling, hvorav inntil 3.000 tonn brisling. Kvoten omfatter også bifangster av andre arter enn sei.
2. 1.200 tonn sei, inklusiv bifangster i andre fiskerier.
3. Makrell.
   P.g.a. den svært lave totalkvoten i 1982 for makrell i Nordsjøen, kunne en fra norsk side ikke gi noen makrellkvote til Færøyane. Dette vil ikke prejudisere spørsmålet om en tildeling til Færøyane av en makrellkvote i senere år.

Antall færøyske fartøyer som fisker tobis begrenses til inntil 6 fartøyer samtidig på 2 nærmere definerte felt.

D. I fiskerisonen ved Jan Mayen.

1. 5.000 tonn kolmule.
2. Lodde.
   P.g.a. den svake bestandssituasjonen for lodde ble det ikke tilbudt noen loddekvote i 1982. Dersom Norge fastsetter en nettokvote for norsk fiske i 1982, vil en fra norsk side vurdere nærmere spørsmålet om en eventuell loddekvote til Færøyane. Overfisket i 1981 vil gå til fradrag fra en eventuell kvote i 1982.

II. Norsk fiske i færøysk sone:

1. 7.000 tonn bunnfisk, hvorav inntil 2.000 tonn sei.
   Fisket skal rettes mot lange, brosme, sei og blåhunge. Torsk kan i mindre omfang inngå som bifangst.
2. 4.000 tonn makrell som prøvefiske.
3. 71.000 tonn kolmule. Av dette kvantum kan inntil 15 000 tonn fiskes pr. om tidsrommet 10. april til 10. juni.

   Antall lisensierte fartøyer: 60
   Antall fartøyer samtidig: 16, dessuten 10 på fiskeleting utenfor det hovedfelt som til enhver tid defineres av det færøyske fiskerioppsyn.
4. 150 tonn brugdelever.

III Lisensieringsspørsmål.

Partene ble enige om innen 1. mars å sende hverandre liste over de fartøyene

som ønsker å delta i fisket i den andre parts sone. Det vil være mulig å etteranmelde fartøyer.

Bergen, 29. januar 1982.

Hallstein Rasmussen

Pauli Ellefsen

Ad løgtingsmál nr. 102/81: Skipan imillum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi 1982.

AGREED RECORD OF CONCLUSIONS OF FISHERY CONSULTATIONS BETWEEN THE EUROPEAN ECONOMIC COMMUNITY AND THE FAROE ISLANDS — BRUSSELS, 1. FEBRUARY 1982.

I. A delegation of the Community headed by Mr. R. SIMMONET and a delegation representing the Home Government of the Faroe Islands headed by Mr. P. ELLEFSEN met in Brussels on 15 January 1982 for consultations on relations in 1982. This meeting was continuation of previous meetings in Copenhagen and Brussels.

II. The delegations agreed to recommend to their respective authorities that the allocations for 1982 set out in the Annex should be made to vessels of either Party fishing in the waters of the other Party. In further consultations the two Parties agreed on the text of the agreed record.

III. **Fishery regulations**

1. The Faroese delegation informed the Community delegation about the technical measures which will apply for fishing in Furoese waters in 1982.

2. In conformity with § 2 of Article 4 of the Agreement on Fisheries between the two Parties the Community delegation informed the Faroese delegation about the new measures the Community might introduce in the course of 1982.

3. The delegations agreed that a Party intending to introduce or to amend fishery regulations applicable to vessels of the other Party shall inform the latter of such intentions with a notice of at least two weeks. Consultations shall be held if so requested by either Party.

IV. **Future consultations**

1. If the situation of the cod stocks off West and East Greenland and the cod fishing will be reopened for fishermen other than Greenland fishermen, the Parties will consult with a view to establishing a quota for the Faroe Islands for these stocks, taking into account Faroese fishing interests in the area.

2. If herring fishery in ICES division IV should be reopened in 1982, the Parties shall consult.

V. **Licences**

The delegations agreed to recommend to their authorities that licences in force as of 31 December 1981 shall remain in force until 28 February 1982 and that the parties shall consult before the said dato on the licencing regimes applicable for the rest of 1982.

Brussels, 1. February 1982.

For P. Ellefsen
M. Riberholdt

R. Simmonet

ANNEX I p. 1

QUOTAS

1. Each Party shall open the catch quotas indicated hereunder for the other in its fishery zone:

1.1. Quotas for Community vessels fishing in the Faroese zone

SPECIES	ICES-division	quantity (tonnes)
Cod	Vb	1.250
Haddock	Vb	1.250
Saithe	Vb	3.500
Redfish	Vb	4.800
Blue Ling	Vb	4.500
Ling	Vb	500
Tusk	Vb	400
Flatfish	Vb	500
Blue whiting	Vb	25.000
Other species	Vb	500

1.2. Quotas for faroese vessels fishing in the Community zone

SPECIES	Fishing zones ICES division or NAFO zone	Quantity (tonnes)	
Ling	VIb	500	(1)
Tusk	VIb	500	(1)
Blue Ling	VIa(2), VIb	400	
Mackerel	IV	—	
Mackerel	VIa(2), VIIc,f,h	10 000	
Herring	VIa(2)	1 800	
Horse mackerel	IV, VIa(2), VIIe,f,h	5 000	
Norway pout	IV, VIa(2)	20 000	(3) (4)
Sprat	IV, VIa(2)	15 000	
Sandeel	IV	15 000	(3)
Blue whiting	VIa(2), VIb, VII(5)	25 000	
Other white fish (by-catches only)	IV, VIa(2)	750	
Herring	IIIaN(Skagerrak)(6)	600	
Northern deepwater Prawn	NAFO 1 (7)	500	
(Pandalus borealis)	XIV	700	(8)
Greenland halibut	NAFO 1	150	
	XIV	150	
Redfish	XIV	600	
Porbeagle	Entire City zone exc. NAFO 3 PS	300	(9)
Capelin	XIV	10 000	

(1) These quotas which are interchangeable shall be fished by Long-Liners only.

(2) North of 56°30'N.

(3) Each of these quotas may be exceeded by a maximum of 5.000t provided that the total catches of Norway pout, sandeel and sprat do not exceed 50.000 t.

(4) Of which maximum 7.000 t may be fished in ICES VIa north of 56°30'N subject to the provision on request by the EEC of details of the quantity and composition of any bycatch taken.

(5) West of 12°W.

(6) Limited in the west by a line drawn from the lighthouse of Hanstholm to the lighthouse of Lindesnes and in the south by a line drawn from Skagen lighthouse to the lighthouse of Tistlarna and from there to the nearest coast of Sweden.

(7) South of 68°N.

(8) Subject to specific conditions which will be determined after consultations between the Parties.

(9) May only be fished by long liners.

A. **Letter from the Home Government of the Faroe Islands.**

Sir,

The Faroese authorities have noted that the EEC has expressed concern regarding Faroese fishery of salmon.

I have the honour to confirm that the Faroese authorities have undertaken to introduce the following restrictions on Faroese salmon fishery:

1. The Faroese authorities will restrict the total volume of salmon catches in Faroese waters (area of fisheries jurisdiction of Faroe Islands) as well of salmon caught by Faroese vessels in waters outside the fisheries jurisdiction of Faroe Islands to a total of 625 metric tonnes in fresh round weight for the season starting on October 1, 1982 and ending on May 31, 1983.

2. The corresponding figure for the season ending May 31, 1982 shall be 750 metric tonnes.

3. No Faroese fishing for salmon will take place outside the fishing seasons referred to under paragraph 1 and 2.

I would be grateful, if you would confirm that the European Economic Community is in agreement with the foregoing.

Please accept, Sir, the assurance of my highest consideration.

For the Homerule Government of the Faroe Islands.

B. Letter from the European Economic Communities.

Sir,

I have the honour to acknowledge receipt of your letter of today's date, which reads as follows:

»The Faroese authorities have noted that the EEC has expressed concern regarding Faroese fishery of salmon.

I have the honour to confirm that the Faroese authorities have undertaken to introduce the following restrictions on Faroese salmon fishery:

1. The Faroese authorities will restrict the total volume of salmon catches in Faroese waters (area of fisheries jurisdiction of Faroe Islands) as well of salmon caught by Faroese vessels in waters outside the fisheries jurisdiction of Faroe Islands to a total of 625 metric tonnes in fresh round weight for the season starting in October 1, 1982 and ending on May 31, 1983.

2. The corresponding figure for the season ending May 31, 1982 shall be 750 metric tonnes.

3. No Faroese fishing for salmon will take place outside the fishing seasons referred to under paragraph 1 and 2.

I would be grateful, if you would confirm that the European Economic Community is in agreement with the foregoing.

Please accept, Sir, the assurance of my highest consideration.«

I have the honour to inform you that the Community has taken note of contents of your letter.

Please accept, Sir, the assurance of my highest consideration.

Please accept, Sir, the assurance of my highest consideration.

For the council of the European Communities.

Frm. 1198 2/82

UMSETING

Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskap millum EEC og Føroyar í Bruxelles 1. februar 1982.

I. Ein sendinevnd, umboðandi felagsskapin við narra R. Simmonnet sum formanni og ein sendinevnd, umboðandi Føroya Landsstýri við harra Paula Ellefsen sum formanni, hittust í Bruxelles 15. januar 1982 til samráðingar um sinamillum fiskiskap í 1982. Hesin fundur var framhald av fundum frammanundan í Keypmannahavn og í Bruxelles.

II. Sendinevndirnar samdust um at viðmæla myndugleikum teirra, at fæ kvotur fyri 1982, ið eru upprotnaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá eigum av pørtunum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum. Í viðari samrøðum samdust partarnir um orðaljoðið í hesi váttaðu frásøgn.

III. **Fiskireglur**

1) Føroyska sendinevndin greiddi felagsskapssendinevndini frá teimum teknisku reglum, ið skulu galda fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi í 1982.
2) Samsvarandi § 4, petti 2, í rammusáttmálanum millum Føroyar og EEC greiddi EEC-myndugleikarnir føroysku sendinevndini frá nýggjum tiltøkum, sum EEC møguliga fór at seta í verk í 1982.
3) Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at innføra ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør frá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring. Samráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað.

IV. **Samráðingar**

1) Um støðan hjá toskastovninum undir Vestur- og Eysturgrønlandi batnar, og aðrir fiskimenn enn grønlendingar skulu byrja fiskiskapin aftur, vilja partarnir ráðføra seg sinamillum við tí í hyggju at seta kvotu fyri Føroyar í hesum stovnum, havandi í huga føroysku áhugamálini á hesum øki.
2) Um sildafiskiskapurin á ICES-økinum IV skuldi byrja aftur í 1982, skulu partarnir ráðføra seg við hvønn annan.

V. **Fiskiloyvir**

Partarnir samdust um at ráða myndugleikum teirra til, at loyvir, sum eru í gildi 31. dec. 1981, skulu verða verandi í gildi til 28. februar 1982, og partarnir skulu samráðast innan nevnda dag um tær fiskiloyvisreglur, ið nýtast skulu restina av 1982.

Bruxelles, 1. februar 1982.

Fyri P. Ellefsen:
M. Riberholdt

R. Simonnet

SKJAL 1 (síða 1)

Kvotur

I. Hvør partur skal lata kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sjóøki sínum:

1.1. Kvotur hjá EEC-skipum á føroyskum sjóøki

Fiskaslag	Øki	Nøgd (tons)
Toskur	Vb	1.250
Hýsa	Vb	1.250
Upsi	Vb	3.500
Kongafiskur	Vb	4.800
Blálonga	Vb	4.500
Longa	Vb	500
Brosma	Vb	400
Flatfiskur	Vb	500
Svartkjaftur	Vb	25.000
Onnur fiskasløg	Vb	500

SKJAL 1 (síða 2)

1.2. Kvotur hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi

Fiskaslag	Fiskiøki ICES-øki ella NAFO-øki	Nøgd (tons)	
Longa	VIb	500	(1)
Brosma	VIb	500	(1)
Blálonga	VIa (2), VIb	400	
Makrelur	IV (eystari stovnur)	—	
Makrelur	VIa(2),VIIc,f,h (vestari st.)	10.000	
Sild	VIa(2)	1.800	
Hestamakrelur	IV, VIa(2), VIIc,f,h	6.000	

Fiskasløg	fiskiøki ICES-øki ella NAFO-øki	Nøgd (tons)	
Hvítingsbróður	IV, VIa(2)	20.000	(3) (4)
Brislingur	IV, VIa(2)	15.000	
Nebbasild	IV	15.000	(3)
Svartkjaftur	VIa (2), VIb, VII (5)	25.000	
Aðrar botnfiskur (bert hjáveiða)	IV, VIa (2)	750	
Síld	IIIaN (Skagerrak) (6)	600	
Rekjur	NAFO I (7)	500	
Rekjur	XIV	700	(8)
Svartkalvi	NAFO I	150	
	XIV	150	
Kongafiskur	XIV	600	
Lodna	XIV	10.000	
Hemari	EEC øki	300	(9)

(1) Hesar kvotur, ið skiftast kann ímillum, kunnu bert fiskast við línu.

(2) Norðan fyri 56° 30'N

(3) Hvør av hesum kvotunum kann yvirfiskast við í mesta lagi 5.000 tonsum, treytað av at samlaða veiðinøgdin fyri hvítingsbróður, nebbasild og brisling ikki fer upp um 50.000 tons.

(4) Av hesum kunnu í mesta lagi 7.000 tons fiskast í ICES-økinum VIa norðan fyri 56° 30'N, treytað av at EEC eftir ábeitan fær gjølligar upplýsingar um veiðinøgd og samanseting av hjáveiðu.

(5) Vestanfyri 12°V.

(6) Avmarkað vestureftir av einari linju frá Hanstholm-vita til Lindesnes-vita, suðureftir av einari linju frá Skagen-vita til vitan í Tistlarna og haðani til nærmastu strond í Svøriki.

(7) Sunnanfyri 68° N.

(8) Fiskiskapur eftir serligum reglum, sum partarnir skulu ráðførast um.

(9) Bert við línu.

SKJAL 1

Bræv frá Føroya Landsstýri

Føroysku myndugleikarnir hava lagt sær í geyma, at EEC hevur sagt seg hava ampa av tí føroyska laksafiskiskapinum.

Føroya Landsstýri kann vátta, at føroysku myndugleikarnir hava átikið sier at gera hesar avmarkingar føroyska laksafiskiskapinum viðvikjandi:

1. Føroysku myndugleikarnir vilja skerja heildarveiðuna av laksi, veidd í føroyskum sjógvi (landleiðini), og eisini av laksi, sum føroysk skip veiða uttan fyri sjóøki Føroya, niður í 625 tons, fesk rundvekt, í veiðutiðini, ið byrjar 1. oktober 1982 og endar 31. mai 1983.

2. Tey samsvarandi tølini fyri veiðutiðina, ið endar 31. mai 1982, skulu vera 750 tons.

3. Fingin laksafiskiskapur skal verða útimtur uttanfyri veiðutiðina, sum umtalað undir pætti 1 og 2.

Føroya landsstýri biður EEC vátta, at tað er samt við omanfyristandandi.

Við hávirðing

FØROYA LANDSSTÝRI

B. **Bræv frá EEC**

EEC hevur fingið skriv landsstýrisins dagfest í dag, sum er soljóðandi:

»Føroysku myndugleikarnir hava lagt sær í geyma, at EEC hevur sagt seg hava ampa av tí føroyska laksafiskiskapinum.

Føroya Landsstýri kann vátta, at føroysku myndugleikarnir hava átikið sær at gera hesar avmarkingar føroyska laksafiskiskapinum viðvikjandi:

1. Føroysku myndugleikarnir vilja skerja heildarveiðuna av laksi, veidd í føroyskum sjógvi (landleiðini), og eisini av laksi, sum føroysk skip veiða uttan fyri sjóøki Føroya, niður í 625 tons, fesk rundvekt, í veiðutiðini, ið byrjar 1. oktober 1982 og endar 31. mai 1983.

2. Tey samsvarandi tølini fyri veiðutiðina, ið endar 31. mai 1982, skulu vera 750 tons.

3. Eingin laksafiskiskaptur skal verða útinntur uttanfyri veiðutíðina, sum umtalað undir pett 1 og 2.

Føroya landsstýri biður EEC vátta, at tað er samt við omanfyristandandi.

Við hávirðing

FØROYA LANDSSTÝRIÐ

EEC sigur við hesum frá, at innihaldið í omanfyri nevnda skrivi er tikið til eftirtekt(ar.

við hávirðing

EEC

SKJAL TIL LØGTINGSMÁL NR. 114: SKJAL 13

Broyting í skattalógini, persónsfrádrátturin, rentufrádrátturin, skattatalvan v.m.

Yvirlit yvir uppskot um broytingar í landsskattinum

Talva 1 **Leysir persónar**

Skattskyldug inntøka	**Núverandi landsskattur**	**Eftir uppskotinum**	**Munur**
Inntøka:	1981/82	A 01 prog 48	munur
20.000	0	0	0
30.000	2.540	2.300	— 240
40.000	5.340	4.900	— 440
50.000	8.770	7.950	— 820
60.000	12.270	11.450	— 820

Talva 1

Leysir persónar

Skattskyldug inntøka	Núverandi landsskattur	Eftir uppskotinum	Munur
70.000	15.770	14.950	— 820
80.000	19.270	18.450	— 820
90.000	22.770	21.950	— 820
100.000	26.270	25.450	820
110.000	29.770	29.050	— 720
120.000	33.270	32.650	— 620
130.000	36.770	36.250	520
140.000	40.270	39.850	— 420
150.000	43.770	43.450	— 320
160.000	47.270	47.050	— 220
170.000	50.770	50.650	— 120
180.000	54.270	54.250	— 20
190.000	57.770	57.850	80
200.000	61.270	61.450	180
210.000	65.520	65.800	280
220.000	69.770	70.150	380
230.000	74.020	74.500	480
240.000	78.070	78.850	780
250.000	82.120	83.200	1.080
275.000	92.645	94.575	1.830
300.000	103.370	105.950	2.580
325.000	114.370	117.700	3.330
350.000	125.370	129.450	4.080
400.000	147.370	152.950	5.580
450.000	169.370	176.450	7.080

Einligir pensjónistar

Talva 2

Skattskyldug inntøka	Núverandi landsskattur	Eftir uppskotinum	Munur
Inntøka	1981/82	A 03 prog 48	munur
20.000	0	0	0
30.000	40	0	— 40

Talva 2

Skattskyldug inntøka	Núverandi landsskattur	Eftir uppskotinum	Munur
40.000	2.840	2.400	— 440
50.000	6.270	5.450	— 820
60.000	9.770	8.950	— 820
70.000	13.270	12.450	— 820
80.000	16.770	15.950	— 820
90.000	20.270	19.450	— 820
100.000	23.770	22.950	— 820
110.000	27.270	26.550	— 720
120.000	30.770	30.150	— 620
130.000	34.270	33.750	— 520
140.000	37.770	37.350	— 420
150.000	41.270	40.950	— 320
160.000	44.770	44.550	— 220
170.000	48.270	48.150	— 120
180.000	51.770	51.750	20
190.000	55.270	55.350	80
200.000	58.770	58.950	180
210.000	63.020	63.300	280
220.000	67.270	67.650	380
230.000	71.520	72.000	480
240.000	75.770	76.350	580
250.000	80.020	80.700	680
275.000	91.145	92.075	930
300.000	102.270	103.450	1.180
325.000	113.770	115.200	1.430
350.000	125.270	126.950	1.680
400.000	147.370	150.450	3.080
450.000	169.370	173.950	4.580

Serskattað hjún

Talva 3

Skattskyldug inntøka	Núverandi landsskattur	Eftir uppskotinum	Munur
Inntøka:	1981/82	A04 prog 48	munur
20.000	1.300	950	— 350
30.000	4.140	3.350	— 790
40.000	7.040	6.050	— 990
50.000	10.570	9.200	— 1.370
60.000	14.170	12.800	— 1.370
70.000	17.770	16.400	— 1.370
80.000	21.370	20.000	— 1.370
90.000	24.970	23.600	— 1.370
100.000	28.570	27.200	— 1.370
110.000	32.170	30.800	— 1.370
120.000	35.470	34.400	— 1.070
130.000	38.770	38.000	— 770
140.000	42.070	41.600	— 470
150.000	45.370	45.200	170
160.000	48.670	48.800	— 130
170.000	51.970	52.400	430
180.000	55.270	56.000	730
190.000	58.570	59.600	1.030
200.000	61.870	63.200	1.330
210.000	65.920	67.550	1.630
220.000	69.970	71.900	1.930
230.000	74.020	76.250	2.230
240.000	78.070	80.600	2.530
250.000	82.120	84.950	2.830
275.000	92.745	96.325	3.580
300.000	103.370	107.700	4.330
325.000	114.370	119.450	5.080
350.000	125.370	130.950	5.580
400.000	147.370	153.950	6.580
450.000	169.370	176.950	7.580

Serskattað hjún (pensionistar)

Talva 4

Skattskyldug inntøka	Núverandi landsskattur	Eftir uppskotinum	Munur
Inntøka	1981/82	05 Prog 48	Munur
20.000	300	300	0
30.000	3.040	2.600	— 440
40.000	5.840	5.200	— 640
50.000	9.270	8.250	— 1.020
60.000	12.770	11.750	— 1.020
70.000	16.270	15.250	— 1.020
80.000	19.770	18.750	— 1.020
90.000	23.270	22.250	— 1.020
100.000	26.770	25.750	— 1.020
110.000	30.270	29.350	— 920
120.000	33.770	32.950	— 820
130.000	37.270	36.550	— 720
140.000	40.770	40.150	— 620
150.000	44.270	43.750	— 520
160.000	47.770	47.350	— 420
170.000	51.270	50.950	— 320
180.000	54.770	54.550	— 220
190.000	58.270	58.150	— 120
200.000	61.770	61.750	— 20
210.000	65.920	66.100	180
220.000	69.970	70.450	480
230.000	74.020	74.800	780
240.000	78.070	79.150	1.080
250.000	82.120	83.500	1.380
275.000	92.745	94.875	2.130
300.000	103.370	106.250	2.880
325.000	114.370	118.000	3.630
350.000	125.370	129.750	4.380
400.000	147.370	153.250	5.880
450.000	169.370	176.750	7.380

Samskattað hjón

Talva 5

Skattskyldug inntøka	Núverandi landsskattur	Eftir uppskotinum	Munur
Inntøka	1981/82	06 Prog 48	Munur
20.000	0	0	0
30.000	40	0	— 40
40.000	2.840	2.400	— 440
50.000	6.270	5.450	— 820
60.000	9.770	8.950	— 820
70.000	13.270	12.450	820
80.000	16.770	15.950	— 820
90.000	20.270	19.450	— 820
100.000	23.770	22.950	— 820
110.000	27.270	26.550	— 720
120.000	30.770	30.150	— 620
130.000	34.270	33.750	— 520
140.000	37.770	37.350	— 420
150.000	41.270	40.950	— 320
160.000	44.770	44.550	— 220
170.000	48.270	48.150	— 120
180.000	51.770	51.750	— 20
190.000	55.270	55.350	80
200.000	58.770	58.950	180
210.000	63.020	63.300	280
220.000	67.270	67.650	380
230.000	71.520	72.000	480
240.000	75.770	76.350	580
250.000	80.020	80.700	680
275.000	91.145	92.075	930
300.000	102.270	103.450	1.180
325.000	113.770	115.200	1.430
350.000	125.270	126.950	1.680
400.000	147.370	150.450	3.080
450.000	169.370	173.950	4.580

Sikjat til løgtingsmál nr. 122: SKJAL 14

Forslag
til

Lov om ændring af forskellige lovbestemmelser for Færøerne om sociale ydelser. (Forhøjelse og teknisk justering af satser m.v.).

§ 1.

I lov for Færøerne om folkepension, jfr. lovbekendtgørelse nr. 542 af 11. november 1976, som ændret ved lov nr. 540 af 31. oktober 1977 og lov nr. 540 af 1. november 1978, foretages med virkning for ydelser, der er forfaldne til udbetaling den 1. oktober 1980 og senere, følgende ændringer:

1. **I § 3, stk. 1,** ændres »22.152 kr.« til:
»32.124 kr.« og »14.412 kr.« til: »20.892 kr.«.

2. **I § 3, stk. 3,** ændres »3.444 kr.« til:
»4.992 kr.« og »2.580 kr.« til: »3.744 kr.«.

3. **I § 4, stk. 1,** ændres »13.700 kr.« til:
»19.900 kr.« og »6.800 kr.« til: »9.900 kr.«

4. **I § 5, nr. 2,** ændres »1.850 kr.« til:
»2.680 kr.« og »3.160 kr.« til: »4.580 kr.«.

5. **I § 6, 1. pkt., ændres »3.510 kr.« til:**
»5.090 kr.« og »5.010 kr.« til: »7.260 kr.«.

6. **§ 9, stk. 1,** affattes således:

»Ved opsættelse af begæring om folkepension i henhold til § 3, stk. 1, ud over de i § 2 nævnte aldersgrænser ydes et tillæg til folkepensionen. For enlige regnes der herved med den alder, som den pågældende havde, da han begyndte at oppebære folkepension, og for ægtefæller med den ældste ægtefælles alder, da ægteparret eller en af ægtefællerne begyndte at oppebære folkepension. Tilæggene ydes efter følgende regler og med følgende beløb, jfr. § 36:

Til ægtepar, når begge opfylder betingelserne for at opnå pension:

	Årlig kr.
Ved opsættelse til den ældste ægtefælles fyldte 70 år	1.920
72 år og derefter	2.940
Til enlige samt ægtepar, når kun den ene ægtefælle opfylder betingelserne:	
Ved opsættelse til det fyldte 70 år	1.308
72 år og derefter	1.896
Til enlige kvinder:	
Ved opsættelse til det fyldte 65 år	432
67 år	924

7. I § 11, stk. 1, ændres »2.388 kr.« til: »3.468 kr.«.

8. I § 11, stk. 2, 1 pkt., ændres »6.400 kr.« til: »9.300 kr.« og »4.400 kr.« til: »6.400 kr.«.

9. I § 12, stk. 1, ændres »1.512 kr.« til: »2.196 kr.«.

10. I § 17, stk. 1, 2. pkt., ændres »18.276 kr.« til: »26.496 kr.«.

11. I § 18, nr. 3, ændres »7.610 kr.« til: »11.030 kr.«.

12. I § 18, nr. 4, 1 pkt., ændres »5.010 kr.« til: »7.260 kr.«.

13. I § 28, stk. 1, 1. pkt., ændres »2.712 kr.« til: »3.936 kr.«.

14. § 38, stk. 1, affattes således:

»Personer, der inden den 1. april 1961 efter reglerne i § 22, stk. 4, i lov nr. 208 af 11. juni 1959 for Færøerne om folkepension, som ændret ved lov nr. 90 af 30. marts 1961, har oppebåret tillæg for opsættelse af begæring om aldersrente eller folkepension til hendholdsvis det 67. og 70. år (ventetillæg), oppebærer fortsat det pågældende tillæg efter 1. april 1961 med følgende beløb, jfr. § 36:

Til ægtepar, når begge opfylder betingelserne for at få pension:

	Årlig kr.
Ved opsættelse til den ældste ægtefælles 67. år	1.248
70. år og derefter	2.004
Til enlige samt ægtepar, når kun den ene ægtefælle opfylder betingelserne for at opnå pension:	
Ved opsættelse til det 67. år.....	816
70. år og derefter	1.320

I lov for Færøerne om folkepension, som ændret ved § 1, foretages med virkning fra den 1. april 1982 følgende ændringer:

1. I **§ 3, stk. 1,** ændres »32.124 kr.« til:
»36.240 kr.« og »20.892 kr.« til: »24.156 kr.«.

2. **§ 11, stk. 1,** affattes således:
»Som tillæg til pensionen ydes et beløb, der for enlige udgør 3.876 kr. årlig og for ægtepar 5.820 kr. årlig, jfr. § 36. For hver pensionist ydes herudover et beløb, svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.«

3. I **§ 17. stk. 1.2. pkt.,** ændres »26.496 kr.« til:
»30.204 kr.«.

§ 2.

I lov for Færøerne om folkepension, som ændret vet § 1, foretages med virkning fra den 1. april 1982 følgende ændringer:

1. I **§ 3, stk. 1,** ændres »32.124 kr.« til:
»36.240 kr.« og »20.892 kr.« til: »24.156 kr.«.

2. **§ 11, stk. 1,** affattes således:
»Som tillæg til pensionen ydes et beløb, der for enlige udgør 3.876 kr. årlig og for ægtepar 5.820 kr. årlig, jfr. § 36. For hver pensionist ydes herudover et beløb, svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.«

3. I § 17, stk. 1, 2. pkt., ændres »26.496 kr.« til:
»30.204 kr.«.

§ 3.

I lov for Færøerne om invalidepension m.v., jfr. lovbekendtgørelse nr. 541 af 11. november 1976, som ændret ved lov nr. 541 af 1. november 1978, foretages med virkning for ydelser, der er forfaldne til udbetaling den 1. oktober 1980 og senere, følgende ændringer:

1. § 4, stk. 1 og 2, affattes således:
»Invalidepensionens grundbeløb udgør følgende beløb årlig, jfr. §§ 5 og 43:

	Helt grundbeløb kr.	Halvt grundbeløb kr.
Til ægtepar, når begge ægtefæller opfylder betingelserne for at opnå samme grundbeløb	32.124	16.056
Til andre	20.892	10.452

Stk. 2. Invaliditetsbeløbet udgør følgende beløb årlig, jfr. § 43:

	Helt invaliditetsbeløb kr.	Halvt invaliditetsbeløb kr.
Til ægtepar, når begge ægtefæller opfylder betingelserne for at opnå samme invaliditetsbeløb	15.900	7.992
Til andre	10.404	5.220

2. I § 4, stk. 4, ændres »10.236 kr.« til:
»14.844 kr.« og »7.056 kr.« til: »10.236 kr.«.

3. I § 5, stk. 1, ændres »13.700 kr.« til:
»19.900 kr.« og »6.800 kr.« til: »9.900 kr.«.
4. I § 6, nr. 2, 1. pkt., ændres »1.850 kr.« til:
»2.680 kr.« og »3.160 kr.« til: »4.580 kr.«, og i
2. pkt. ændres »5.370 kr.« til: »7.790 kr.« og »7.610 kr.«
til: »11.030 kr.«.

5. I § 7, 1. pkt., ændres »3.510 kr.« til: »5.090 kr.« og »5.010 kr.« til: »7.260 kr.«.

6. I § 8, stk. 1, 1. pkt., ændres »3.510 kr.« til: »5.090 kr.« og »5.010 kr.« til: »7.260 kr.«.

7. I § 11, 1. pkt., ændres »7.176 kr.« til: »10.404 kr.« og i 2. pkt. ændres »14.364 kr.« til: »20.832 kr.«.

8. I § 12, stk. 1, ændres »2.388 kr.« til: »3.468 kr.«.

9. I § 12, stk. 2, 1. pkt., ændres »6.400 kr.« til: »9.300 kr.« og »4.400 kr.« til: »6.400 kr.«.

10. I § 13, stk. 1, ændres »1.512 kr.« til: »2.196 kr.«.

11. I § 16, stk. 1, 3. pkt., ændres »10.968 kr.« til: »15.900 kr.« og »7.176 kr.« til: »10.404 kr.«.

12. I § 16, stk. 2, 1. pkt., ændres »10.968 kr.« til: »15.900 kr.«.

13. I § 45, stk. 1, 2. pkt., ændres »1.716 kr.« til: »2.484 kr.«.

14. I § 45, stk. 4, 2. pkt., ændres »2.844 kr.« til: »4.128 kr.«.

§ 4.

I lov for Færøerne om invalidepension, som ændret ved § 3, foretages med virkning fra den 1. april 1982 følgende ændringer:

1. **§ 4, stk. 1,** affattes således:

»Invalidepensionens grundbeløb udgør følgende beløb årlig, jfr. §§ 5 og 43:

	Helt grundbeløb kr.	Halvt grundbeløb kr.
Til ægtepar, når begge ægtefæller opfylder betingelserne for at opnå samme grundbeløb	36.240	18.120
Til andre	24.156	12.084

2. **§ 12, stk. 1,** affattes således:

»Som tillæg til invalidepension i henhold til § 3, stk. 2 og 3, ydes et beløb, der for enlige udgør 3.876 kr. årlig og for ægtepar 5.820 kr. årlig, jfr. § 43. For hver pensionist ydes herudover et beløb, svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.«

§ 5.

I lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring, jfr. lovbekendtgørelse nr. 554 af 7. november 1977, som ændret ved lov nr. 215 af 23. maj 1979, foretages med virkning for ydelser, der er forfaldne til udbetaling den 1. oktober 1980 eller senere, følgende ændring:

I § 20, stk. 1., 2. pkt., ændres »1.400 kr.« til:
»2.030 kr.«.

§ 6.

I lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v., jfr. lovbekendtgørelse nr. 12 af 9. januar 1978, foretages med virkning for ydelser, der er forfaldne til udbetaling den 1. oktober 1980 eller senere, følgende ændringer:

1. I **§ 4,** ændres »3.336 kr.« til:
»4.836 kr.« og »2.208 kr.« til: »3.204 kr.«.

2. I **§ 5, stk. 1,** ændres »190 kr.« til:
»276 kr.« og »332 kr.« til: »481 kr.«.

3. I **§ 14, stk. 1,** ændres »3.336 kr.« til:
»4.836 kr.«.

4. I **§ 14, stk. 3,** ændres »5.520 kr.« til:
»8.000 kr.«.

Bemærkninger til lovforslaget.

Lovforslaget indeholder forslag til ændringer af følgende love:

1. Lov for Færøerne om folkepension.
2. Lov for Færøerne om invalidepension m.v.
3. Lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring.
4. Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.

Forslaget indeholder dels en forhøjelse af grundbeløbet og pensionstillæg i pensionslovene, dels en teknisk justering (»nulstilling«) af satser m.v. i overensstemmelse med den justering, der i 1980 blev foretaget for tilsvarende satser m.v. for den øvrige del af riget.

Forslaget er teknisk opstillet således, at pensionssatser m.v. er »nulstillt« i §§ 1 og 3, mens forhøjelser af grundbeløb og pensionstillæg er foretaget i §§ 2 og 4. §§ 5 og 6 vedrører »nulstilling« af beløb i lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring og lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.

1. Forhøjelse af grundbeløb og pensionstillæg i pensionslovene.

De gældende færøske regler om folkepension findes i lov nr. 58 af 15. marts 1967 for Færøerne om folkepension (Folketingstidende 1966-67, sp. 74, 300, 2039 og 2162. Tillæg A, sp. 473. Tillæg B, sp. 101. Tillæg C, sp. 221). Loven er senere ændret flere gange. Seneste lovbekendtgørelse er nr. 542 af 11. november 1976, som ændret ved lov nr. 540 af 31. oktober 1977 og lov nr. 540 af 1. november 1978.

De gældende færøske regler om invalidepension findes i lov nr. 55 af 15. marts 1967 for Færøerne om invalidepension m.v. (Folketingstidende 1966-67, sp. 74, 300, 2039 og 2162. Tillæg A, sp. 433. Tillæg B, sp. 101. Tillæg C, sp. 197).

Loven er senere ændret flere gange.

Seneste lovbekendtgørelse er nr. 541 af 11. november 1976, som ændret ved lov nr. 541 af 1. november 1978.

Bortset fra de forhøjelser af pensionerne, der er en følge af stigningen i pristallet, blev det færøske pensionsniveau senest forhøjet med virkning fra den 1. april 1975, jfr. lov nr. 241 af 12. juni 1975 om ændring af lov for Færøerne om folkepension og

lov nr. 242 af 12. juni 1975 om ændring af lov for Færøerne om invalidepension m.v.

I den øvrige del af riget har pensionerne været forhøjet flere gange siden 1975, bl.a. i forbindelse med 1. fase af udbetalingerne fra den sociale pensionsfond pr. 1. januar 1979.

I de seneste år har der fra færøsk side flere gange været udtrykt ønske om i videst muligt omfang at tilnærme det færøske pensionsniveau til det niveau, der gælder for det øvrige rige.

Spørgsmålet har senest været drøftet i december 1981 i det særlige udvalg vedrørende sociallovgivningen for Færøerne, hvor der opnåedes enighed om de forhøjelser af de færøske pensioner, der er udmøntet i nærværende lovforslag.

Herefter forhøjes grundbeløb og pensionstillæg til enlige pensionister og pensionister gift med ikke-pensionister til satserne for den tilsvarende gruppe i det øvrige rige pr. 1. januar 1979. Satserne for grundbeløb og pensionstillæg til samgifte pensionister udgør efter forslaget 150 pct. af satserne for enlige. Der sker herved en tilnærmelse af ægtefællepensionerne til det dobbelte af pensionen til en enlig. Øvrige tillæg m.v. forhøjes ikke.

På baggrund af et skøn over antallet af pensionister på Færøerne er merudgifterne under forudsætning af, at de forhøjede satser udbetales med virkning fra 1. april 1982, anslået til 15 mill. kr. i 1982, incl. afledede virkninger på forsorgslovens område. Den statslige andel af merudgifterne udgør ca. 7,4 mill .kr. i 1982. De resterende merudgifter afholdes af de færøske hjemmestyre. I 1983 er statens andel anslået til 9,9 mill. kr. af samlede merudgifter på 20,4 mill. kr.

II. Teknisk justering af satser m.v. (»nulstilling«).

Denne del af forslaget indeholder ændringer af 4 af de sociale love for Færøerne, nemlig lov for Færøerne om folkepension, lov for Færøerne om invalidepension m.v.; lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring samt lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.

Efter de gældende færøske regler dyrtidsreguleres de sociale ydelser i de nævnte love i samme forhold som de tilsvarende ydelser i den lovgivning, der gælder for den øvrige del af riget.

Hidtil er dyrtidsreguleringen sket på grundlag af reguleringspristallet for januar og juli, der har januar 1975 = 100 som udgangspunkt. Imidlertid er de sociale ydelser i den lovgivning, der gælder for den øvrige del af riget ved lov nr. 255 af 16. juni 1980 om ændring af forskellige lovbestemmelser vedrørende anvendelse af reguleringspristallet ændret således, at de nu er fastsat på grundlag af reguleringspristallet for januar og juli med januar 1980 = 100 som udgangspunkt. Ved det foreliggende lovforslag ændres de nævnte færøske love på linie med de ændringer, som er gennemført i den øvrige del af riget, således at beløbene nu har januar 1980 = 100 som udgangspunkt.

De i lovforslaget indeholdte beløb er beregnet ved at opregulere de gældende beløb til pristal 145, således som det skete med de tilsvarende beløb i den lovgivning, der gælder for den øvrige del af riget.

Denne del af forslaget er udelukkende af teknisk karakter, og medfører ikke merudgifter.

III. Det er ved lagtingsbeslutning vedtaget at anbefale regeringen at fremsætte nærværende lovforslag for folketinget.

I dette bilag er (med mindre skrift) indsat den gældende formulering af de bestemmelser der berøres af den del af lovforslaget, der vedrører forhøjelse af pensionssatserne.

§ 1.

I lov for Færøerne om folkepension foretages med virkning for ydelser, der er forfaldne til udbetaling den 1. oktober 1980 og senere, følgende ændringer:

1. I § 3, stk. 1, ændres »11.152 kr.« til:
»32.124 kr.« og »14.412 kr.« til: »20.892 kr.«.

7. I § 11, stk. 1, ændres »2.388 kr.« til:
»3.468 kr.«.

10. I § 17, stk. 1, 2. pkt., ændres »18.276 kr.« til:
»26.496 kr.«.

§ 2.

I lov for Færøerne om folkepension, som ændret ved § 1, foretages med virkning fra den 1. april 1982 følgende ændringer:

1. I § 3, stk. 1, ændres »32.124 kr.« til:
»36.240 kr.« og »20.892 kr.« til: »24.156 kr.«.

2. § 11, stk. 1, affattes således:
»Som tillæg til pensionen ydes et beløb, der for enlige udgør 3.876 kr. årligt for ægtepar 5.820 kr. årlig, jfr. § 36. For hver pensionist ydes herudover et beløb, svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.«

3. I **§ 17, stk. 1, 2. pkt.**, ændres »26.496 kr.« til:
»30.204 kr.«.

§ 3. Folkepensionen udbetales med følgende grundbeløb, jfr. dog §§ 4 og 36: til ægtepar, når begge opfylder betingelserne for at opnå pension, 22.152 kr. årlig, til andre 14.412 kr. årlig.

§ 11. Som tillæg til pensionen ydes et beløb, der både for enlige og for ægtepar udgør 2.388 kr. årlig, jfr. § 36, samt for hver pensionist et beløb svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.

§ 17. Til ægtepar, hvoraf den ene ægtefælle oppebærer folkepension i medfør af § 3, stk. 1, og den anden pension i henhold til § 3, stk. 2 eller 3, i lov for Færøerne om invalidepension m.v., udgør det samlede grundbeløb det i § 3, stk. 1, i nærværende lov anførte beløb for ægtepar. Oppebæres invalidepensionen i henhold til § 3, stk. 4, i lov for Færøerne om invalidepension m.v., udgør grundbeløbet 18.276 kr. årlig, jfr. §§ 18 og 36.

§ 3.

I lov for Færøerne om invalidepension m.v., foretages med virkning for ydelser, der er forfaldne til udbetaling den 1. oktober 1980 og senere, følgende ændringer:

1. **§ 4, stk. 1,** affattes således:
»Invalidepensionens grundbeløb udgør følgende beløb årlig, jfr. §§ 5 og 43:

	Helt grundbeløb kr.	**Halvt grundbeløb kr.**
Til ægtepar, når begge ægtefæller opfylder betingelserne for at opnå samme grundbeløb ..	32.124	16.056
Til andre	20.892	10.452

8. I **§ 12, stk. 1**, ændres »2.388 kr.« til:
»3.468 kr.«.

§ 4.

I lov for Færøerne om invalidepension, som ændret ved § 3, foretages med virkning fra den 1. april 1982 følgende ændringer:

1. § 4, stk. 1, affattes således:
»Invalidepensionens grundbeløb udgør følgende beløb årlig, jf. §§ 5 og 43:

	Helt grundbeløb kr.	**Halvt grundbeløb kr.**
Til ægtepar, når begge ægtefæller opfylder betingelserne for at opnå samme grundbeløb	36.240	18.120
Til andre	24.156	12.084

2. § 12, stk. 1, affattes således:
»Som tillæg til invalidepension i henhold til § 3, stk. 2 og 3, ydes et beløb, der for enlige udgør 3.876 kr. årlig og for ægtepar 5.820 kr. årlig, jfr. § 43. For hver pensionist ydes herudover et beløb, svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.«.

§ 4. Invalidepensionens grundbeløb udgør følgende beløb årlig, jfr. §§ 5 og 43:

	Helt grundbeløb kr.	**Halvt grundbeløb kr.**
Til ægtepar, når begge ægtefæller opfylder betingelserne for at opnå samme grundbeløb	22.152	11.076
Til andre	14.412	7.212

§ 12. Som tillæg til invalidepension i henhold til § 3, stk. 2-3, ydes et beløb, der både for enlige og ægtepar udgør 2.388 kr. årlig, jfr. § 43, samt for hver pensionist et beløb svarende til det normale årlige bidrag for et nydende medlem af sygekassen.

SKJAL TIL LØGTINGSMÁL NR. 127:
LØGTINGSLÓG UM BJÁLVINGARSTUDUL TIL PENSJÓNISTAR.

SKJAL 15

Bjálving og tetting I

Hús hjá pensionistum

Januar 1982

INNIHALDSYVIRLIT

4.2.4.	Innleiðing	s. 1
2.	Ymisk húsasløg	s. 2
3.	Møguligar ábøtur og ávirkan á orkubúskapin	s. 2
4.	Meting um iløgu í mun til oljusparing	s. 4
4.1.	Fortreytir	s. 6
4.2.	Búskaparlig meting	s. 7
4.2.1.	Núvirðið	s. 7
4.2.2.	Núvirðið av iløgunum	s. 8
4.2.3.	Núvirðið av rakstrarútreiðslunum	s. 8
4.2.4.	Núvirðisútreiðslur	s. 8
4.3.	Meting um úrslit	s. 12
4.3.1.	Mynd 4-1	s. 12
4.3.2.	Mynd 4-2	s. 12
5.	Niðurløga	s. 17
5.1.	Landsbúskaparlig iløga	s. 17
5.2.	Ávirkan av iløguni	s. 18
5.3.	Heildarmynd	s. 19

Bjálving og tetting

1. Innleiðing

Samlaða oljunýtslan í Føroyum var í 1980/81 um 184.000 tons, og av hesum vóru 21% nýtt til bústaðaruppbiting. T.e. at um 38.600 tons av olju vóru nýtt til hetta endamál.

Við oljuprísinum í juni 1981 svarar hetta til eina árliga upphitingarútreiðslu, roknað í 1981-kr., sum er 110 mió. kr.

Tann síðsta almenna íbúðaruppgerðin frá 1977 sigur, at samlaða talið av sethúsum tá var 9.443. Síðan eru bygd um 350 sethús hvørt árið, so samlaða talið av sethúsum í dag er um 10.650. Árligu miðalútreiðslurnar til olju eru sostatt um 9.250,- kr. pr. hús, tá oljunýtslan til skúlar o.a. størri bygningar ikki verður íroknað. Við tí prísgongd, sum síðan fyrst í sjeytiárunum hevur verið á oljuráevnum, er hendan útreiðsla vorðin ógvuliga tung at bera, bæði hjá tí einstaka og hjá landinum sum heild.

Orsakað av hesum og øðrum viðurskiftum í samband við orkuspurningin sum heild, er neyðugt at umhugsa tiltøk, ið kunnu minka um olju-/orkunýtsluna.

Áðrenn 1965 var ikki vanligt, at nýggj hús vóru bjálvað, meðan tað eftir hetta gjørdist meira og meira ein náttúrligur táttur í samband við sehúsabygging. Ikki fyrr enn hesi 5-8 seinastu árini er vorðið vanligt at bjálva og tetta húsini á hóskandi hátt. Hús, sum góður møguleiki er at gera munandi orkubúskaparlig sparitiltøk á, eru sostatt tey, ið eru bygd áðrenn 1965-70. Hesi eru sambært íbúðaruppgerðina frá 1977 um 8.700 í tali.

Ráðið er komið væl áleiðis við at kanna, hvørjir møguleikar eru at gera orkubúskaparligar ábøtur á sethús, men í hesi frágreiðing er bert tann parturin, sum viðvikur pensionistum, tikin við. Av teimum 8.700 húsunum eru pensionistaíbúðirnar um 2.100 í tali.

2. Ymisk húsasløg.

Tað tykist møguligt at flokka húsasløgini í ymiskar flokkar, sum eru treytaðir av, hvussu húsini eru uppbygd.

Fyri at fáa eina meting um, hvussu nógvar flokkar talan kann verða um, er ein kanning gjørd, har Sands bygd verður nýtt sum fyrimynd. Húsini har eru skrásett — tilsamans 20 í tali - og av hesum átti pensionistar 68 hús. Hesi 68 húsini eru síðan, treytað av byggihátti, býtt upp í 7 flokkar.

Verða húsini í Sandsbygd sammett við hús í øllum Føroyum, eru tey yvirhøvur nakað eldri í Sandsbygd, t.e., uppá seg eru tey seinru árini fram ímóti 1977 bygd færri hús á Sandi enn um allar Føroyar. Hjálagda mynd, 2-1, vísir hesi viðurskifti.

Um hugt verður eftir, hvørjum tilfari húsini eru bygd úr, er ikki stórur munur á viðurskiftunum í Sandsbygd og fyri allar oyggjarnar, tó eru uppá seg fleiri betong-

hús í Sandsbygd, nevniliga 62 721 um húsunum, meðan talið fyri allar Føroyar er 55%. Fyri klødd timburhús ni ávikavist 25% og 27%, og fyri ikki klødd timburhús 13% og 18%.

Samanumtikið er so lítið frávik millum Sandsbygd og allar Føroyar, at húsaviðurskiftini í hesum sambandi kunnu sigast vera tey somu.

3. Møguligar ábøtur og ávirkan á orkubúskapin


Orkutørvurin til upphiting av sethúsum stavar í høvuðsheitinum frá luftskifti (gjóstri) og hitamissi gjøgnum gólv, veggir og tak umframt strálingstapi gjøgnum vindeygu.

Í flestu húsum, bygd áðrenn 1967, er luftskiftið, orsakað av ótøttum vindeygum og hurðum, væl størri enn neyðugt.

Roknað verður tí við, at tettingarlistar verða settir um úthurðar og vindeygarammur, og at luftskiftið tá verður um 1 ferð um tíman. Eisini er sum dømi roknað við at seta upp forsatsrútar, har einkult glas er í vindeygunum og útskifta vindeygu, sum eru rotin. Aðrar ábøtur, ið roknað er við, er á gólv, útveggir og tak.

MYND 2 - 1.

Tal av húsum frá 1920 og framyvir í mun til hús í 1977.



Dømi: Fram til 1940 vóru bygd so nógv hús í Føroyum, at talið av húsum tá svarar til 36% av øllum húsum í Føroyum bygd fram til 1977.

Um hitatapið verður roknað út fyri hvørja ábót sær á allar húsaflokkar, er møguligt at seta upp, hvussu ein ávis ábót ávirkar orkutørvin í einum miðal húsi, og kann somuleiðis miðalkostnaðurin fyri eina ábót verða settur upp til sammetingar.

Treytað av at miðal innandura hitastigið er um 20°C, skuldi oljunýtslan, áðrenn ábøtur, verið um 6.300 litur/ár, meðan meðalnýtslan í veruleikanum er um 40% av hesum. Hetta kemst sjálvandi av, at tílík hús bert eru hitað upp í teimum rúmum, ið verða mest nýtt.

Tá hugsað verður um sparda olju í mun til íløgur til ábøtur, er helst rætt, sæð frá einum búskaparligum sjónarmiði, at rokna út frá tí veruligu miðal oljunýtsluni. Men ikki eigur at verða gloymt at eftir ábót kann størri partur av húsinum verða upphitaður við somu nøgd av olju, og at tað tá verður meira liviligt og gott fyri heilsuna at búgva í húsinum.

Tær kanningar, ið eru gjørdar, benda á, at við eini íløgu pr. hús, ið er um 30.000,- kr., kann hitatapið minkast niður í eina helvt. Íroknað hesi íløgu eru arbeiðstímaútreiðslur um 10.000,- kr. Verður íløgan økt til 60.000,- kr., kann hitatapið minkast niður til um 30%, og eru arbeiðstímaútreiðslurnar tá um 20.000,- kr.

Meting um arbeiðstímaútreiðslurnar í samband við tær ymisku ábøturnar eru gjørdar, tí ein stórur partur av tílíkum arbeiði vanliga verður gjørt sum egið arbeiði, og ávirkar hetta aftur, hvussu stórar ábøtur kunnu verða gjørdar fyri eina ávísa upphædd.

4. Meting um íløgu í mun til oljusparing.

Neyðugu íløgur til ávisar ábøtur hjá tí einstaka verða vanliga bert gjørdar, um ágóðin av hesum íløgum, í einum ávísum tíðarskeiði, rinda seg aftur á ein ella annan hátt.

Í hesum føri, tá talan er um ábøtur hjá pensionistum, metir ráðið, at afturrindingartíðin fyri ávísar ábøtur eigur at verða kannað út frá einum landsbúskaparligum sjónarmiði.

Um neyðuga íløgan, $K_á$, til eina ávísa ábót verður avskrivað yvir eitt áramál, N ár, og oljusparingin, ið stendist av hesi ábót, er $\triangle$ G litur av olju pr. ár, er møguligt at seta upp rakstrarkostnaðin, $\triangle$ D, fyri upphitingarútreiðslurnar í einum tílíkum miðalhúsi, áðrenn í mun til eftir at ábótin er gjørd.

Úrslitið av rakstrarkostnaðinum fyri upphiting av einum tílíkum miðal pensionistahúsi er treytað av, hvussu oljuprísgongdin verður í avskrivingartíðarskeiðinum, og tá íløgur verða gjørdar, verður úrslitið harumframt treytað av avskrivingartíð, rentuupphædd og av oljusparing í mun til upphædd.

4.1. Fortreytir.

Í samband við tílíkar útrokningar, sum talan er um her, er ikki møguligt at seta upp

eintáttaðar fortreytir, tí ringt er t.d. at spáa um prísgongd framyvir og viðvikjandi avskrivingartíð kann hugsast, at onkur heldur 10 ár vera rímuligt, meðan ein annar heldur 20-25 ár vera betur.

Tá talan er um rentuupphædd í eini samfelagsbúskaparligari meting, verður vanliga roknað við eini realrentu, ið liggur ímillum 5 og 7% p.a., treytað av lánimøguleikunum og inflatión.

Avgjørt er tí at gera tær búskaparligu metingarnar við ymiskum hugsandi fortreytum, og eru tær hesar:

Avskrivingartíðin $N = 20$ ár

Realrentan er $r_r = \begin{cases} 5\% \text{ p.a.} \\ 6\% \text{ p.a.} \\ 7\% \text{ p.a.} \end{cases}$

Prísgongd í gassolju $b_0 = \begin{cases} 0\% \text{ p.a.} \\ 2\% \text{ p.a.} \\ 4\% \text{ p.a.} \end{cases}$

Her er talan um realpríshækkingar, t.e. b_0 % yvir inflatiónini.

Prísur á gassolju, incl. toll, í dec. 1981 er: $k_0 = 2{,}50$ litur

Tollur á gassolju er : $t_0 = 5\%$.
Tollur á tímbur og bjálving : $t_b = 25\%$.

Samanhangið millum neyðugar iløgur til ábøtur og møguliga orkusparingin í einum miðal pensionistahúsi, sýnist í einum øki fyri iløgurnar frá 0 - 70.000,- kr., at fylgja einum parabli, og samanhangið kann verða sett upp sum:

$$S_0 = -3{,}4 \times 10^{-9} \times K_á^2 + 0{,}0014 \times K_á, \text{ har}$$

S_0 er møgulig orkusparing í % av upprunaligu orkunýstluni áðrenn nakra ábót.

Miðaloljunýtslan í einum pensionistahúsi er í dag um 2.510 litur pr. ár.

4.2. Búskaparlig meting.

Sum grundarlag fyri eini búskaparligari meting av hesum slagi, verður mett, at núvirðisháttur in er væl hóskandi.

4.2.1. Núvirðið.

Núvirðið av teimum samlaðu útreiðslunum er definerað soleiðis:

$$N_u = N_{u_A} + N_{u_R}$$

N_{u_A} er núvirðið av íløgunum og

N_{u_R} eru allar rakstrarútreiðslurnar í ti tiðarskeiðinum, metingin fevnir um, førdar aftur við rentuni til tíðina, tá metingin fer fram.

Um tað skal gerast møguligt at fáa eitt rimuligt úrslit av einari tílíkari meting, er neyðugt at taka inflasjónsávirkanina burtur, tá núvirðið verður útroknað.

Roknað verður við, at inflasjónin hevur somu ávirkan á rentu, íløgu- og rakstrarútreiðslurnar, og kann núvirðið tí roknast út við einari felags tillagaðari rentu. Hendan rentan verður vanliga kallað realrentan og verður roknað sum munurin millum marknaðarrentuna og inflasjónsratuna.

Í teinum útrokningum, sum gjørdar verða her, verður realrentan sett at vera 5, 6 og 7%, og metingin gongur N ár fram. Allir prísir eru í 1981-kr.

4.2.2. Núvirði av íløgunum, N_{u_A}.

Núvirðið av iløgunum, N_{u_A}, verður: $N_{u_a} = \sum_{i=0}^{i=n-1} K_o(1 + r)^{-i}$,

har K_o er upphæddin, ið skal gjaldast í ár i eftir tíðspunktið, tá metingin fer fram (1981) og r er realrentan (5, 6 og 7%).

4.2.3. Núvirðið av rakstrarútreiðslunum N_{u_R}.

Rakstrarútreiðslurnar, sum í hesum føri bert fevna um brennievniskostnað, verða

útroknaðar fyri hvørt árið sær og síðan førdar aftur til metingartíðspunktið, fyri at finna núvirðið.

Tá roknað verður við, at prisvøksturin á olju verður b% p.a. hægri enn inflatiónin, er neyðugt at korrigera fyri hesum.

Samlaða núvirðið av n líka stórum gjøldum verður útroknað eftir annuitetsreglani:

$$1 + (1 + r)^{-1} + (1 + r)^{-2} + \cdots + (1 + r)^{-(n-1)} = \frac{1-(1+r)^{-n}}{r}$$

har r er realrentan og n er áramálið, talan er um.

Um gjaldingarnar ístaðin eru javnt vaksandi við b% p.a., verður samlaða núvirðið:

$$1 + \frac{1+b}{1+r} + \left(\frac{1+b}{1+r}\right)^2 + \cdots + \left(\frac{1+b}{1+r}\right)^{n-1} = \frac{1 - \left(\frac{1+b}{1+r}\right)^{n}}{\frac{r-b}{1+b}}$$

4.2.4. Núvirðisútreiðslur.

Í fortreytunum er samanhangið millum íløgur og orkusparing sett upp, men onki sagt um landsbúskapin og tollin.

Mett verður, at tollurin á timbur- og bjálvingartilfari ikki eigur at verða iroknaður, tá landsbúskaparligar metingar verða gjørdar, og sama er galdandi fyri oljuna.

Roknast kann við, at tilfarið liggur um 2/3 av íløguni til tílíkar ábøtur, talan er um, og verður tollur sostatt bert at rokna av hesum.

Núvirðiðs-upphitingarútreiðslurnar til eitt miðalpensionistahús í ár i verða tá:

$$D_0 = G_0 \times (k_0 / (1 + t_0/100)) \times \left(\frac{1+b}{1+r}\right)^i \quad ; \ 0 \le i \le n-1,$$

og til eitt, ið hevur fingið ávísar ábøtur, eru núvirðis-upphitingarútreiðslurnar í ár i:

$$D_á = G_0 (1 - S_0/100) \times (k_0 / (1 + t_0/100)) \times \left(\frac{1+b}{1+r}\right)^i +$$

$$(1/3 K_á + (2/3 \times K_á / (1 + t_b/100)) \times 1 - (\frac{r}{1+r})^n \times (1+i)^{-i} ;$$

$$0 \le i \le n-1.$$

Munurin á núvirðisútreiðslunum fyri eitt miðal pensionistahús áðrenn og eftir cina ávísa ábót verður sostatt:

$$\Delta D = D_0 - D_á = G_0 \times S_0/100 \times \left(k_0 / (1 + t_0/100)\right) \times \left(\frac{1 + b}{1 + r}\right)^i -$$

$$\left[1/3\ K_á + (2/3 \times K_á / (1 + t_b/100))\right] \times \frac{r}{1 - (1 + r)^{-n}} \times (1 + r)^{-i}$$

meðan tær akkumuleraðu núvirðisútreiðslurnar fyri hvørt húsið í ári »i« verða:

A: áðrenn ábót:

$$D_0 = \sum_{i=0}^{i=n-1} G_0 \times (k_0 / (1 + t_0/100)) \times \left(\frac{1 + b}{1 + r}\right)^i$$

$$= G_0 \times (k_0 / (1 + t_0/100)) \times \frac{1 + \left(\frac{1 + r}{1 + b}\right)^{-i}}{\frac{r - b}{1 + b}} \qquad \text{og}$$


B: eftir ábót:

$$D_á = \sum_{i=0}^{i=n-1} G_0(1 - S_0/100) \times (k_b/(1 + t_0/100)) \times \left(\frac{1 + b}{1 + r}\right)^i +$$

$$(1/3\ K_á + K_á(2/3\ K_á\ /(1 + t_b/100))) \times \frac{r \times (1+r)^{-i}}{1-(1+r)^{-n}}$$

$$= G_0(1 - S_0/100) \times (k_0 /(1 + t_0/100)) \times \frac{1 + \left(\frac{1 + r}{1 + b}\right)^{-n}}{\frac{r - b}{1 + b}} +$$

$$(1/3\ K_á + (2/3\ K_á/(1 + t_0/100))).$$



Mynd 4-1.

Rakstrarútreiðslur til upphiting í einum verandi pensionistahúsi (oljunýtslan í miðal 2519 l/ár) frádrigið rakstrarútreiðslunum til upphiting í einum pensionistahúsi har iløgur til orkusparandi tiltøk eru lagdar. (1981-Kr.)

4.3. Meting um úrslit.

Úrslitini av útrokningunum eru sett upp í strikumynd, mynd 4-1 og 4-2.

4.3.1. Mynd 4-1.

Henda mynd sýnir munin í rakstrarútreiðslunum til upphiting í einum pensionistahúsi áðrenn og eftir, at ábøtur eru framdar. Rakstrarútreiðslurnar eru fyri hvørt árið roknaðar í 1981-kr. Rakstrarútreiðslurnar til upphiting í einum verandi húsum, t.e. áðrenn nøkur ábót er framd, eru roknaðar at vera útreiðslur til olju (2510 l/ár), meðan tær fyri eini hús, har ábøtur eru framdar, eisini fevna um rentur og avdrátt.

Munurin á rakstrarutreiðslunum er treytaður av íløgunum, ið gjørdar verða til ábøtur umfram avskrivingartíðini fyri íløguna.

Mynd 4-1 er sett upp við íløguni sum parametur, meðan realrentan, r, er sett at vera 7% p.a., realprishækkingin á olju, b, er sett til 2% p.a. og avskrivingartíðin, N, er 20 ár.


Við hesum treytum fyri útrokningunum vísir myndin (4-1), at um íløgur, sum eru millum 10.000,- og 60.000,- kr., verða gjørdar, kann roknast við, at ágóðin av hesum kemur landinum til góðar eftir 0 til 8 árum treytað av íløguupphæddini.

Eisini vísir myndin, at spardu oljuútreiðslurnar hava goldið avskrivingar og rentuútreiðslurnar aftur eftir 1 til 16 árum, og merkir hetta, at ein íløga millum 10.000,- og 60.000,- kr. verður afturgoldin í avskrivingartíðini.

4.3.2. Mynd 4-2.

Myndin sýnir núvirðið av samlaða munum í upphitingarútreiðslum eftir 20 árum fyri eitt verandi miðal pensionistahús (oljunýtslan er 2510 l/ár), og eitt, har íløgur millum 10.000,- og 60.000,- kr. eru gjørdar til ábøtur, ið kunnu minka um orkutørvin til upphiting.

Hesar spardu oljuútreiðslur eru treytaðar av íløguni, ið verður gjørd og av realprisgongdini fyri olju. Í myndini (4-2) eru tær spardu ávikavist øktu núvirðisútreiðslurnar til upphiting settar upp fyri realoljuprísgongdina, b = 0% p.a., 2% p.a. og 4% p.a.



b = 0% p.a.

Um ikki verður roknað við nakrari realprishækking fyri olju tey næstu 20 árini, t.e. at oljuprisirnir bert fylgja inflatiónini, visir myndin (4-2), at tað, sær frá einum landsbúskaparligum sjónarmiði, ikki lønar seg at gera íløgur til orkusparandi ábøtur á tílik pensionistahús, sum talan er um her. Hetta kann tykjast heldur løgið, men er orsøkin tann, at miðal pensionistahúsið í dag bert hevur ein part av húsinum hitað upp til um 20°C, meðan restin av húsinum stendur køld. Tað er tí ein lutfalsliga lítil partur av olju, ið kann sparast, í mun til tær neyðugu íløgurnar til orkusparandi tiltøk.

Hevði talan verið um eitt ávist pensionistahús, sum t.d. hevði alt húsið upphitað til um 20°C, hevði myndin verið ein heilt onnur.

Hetta verður tó ikki nærri viðgjørt í hesi frágreiðing, tí hon hevur til endamál at viðgera viðurskiftini í einum miðal pensionistahúsi.

b = 2% p.a.

Realprisgongdin fyri olju hevur hesi seinastu árini verið væl omán fyri inflatiónina, og við tí útliti, ið er viðvíkjandi oljunøgdini í heiminum í mun til nøgdir, ið verða nýttar, er ongin grund til at halda, at hendan prisgongd brádliga fer at steðga.

Rímiligt er tí at rokna við eini realprisgongd, ið er 2% p.a.

Tá vísir myndin (4-2), at tað er ein landsbúskaparligur fyrimunur at gera íløgur millum 10.000,- og 60.000,- kr., og at størsti fyrimunur í hesum 20-ára skeiði fæst, um íløgan verður 30.000 - 32.000 kr.

Núvirðið av samlaðu sparingini verður tá um 2.900,- kr. fyri eitt miðal pensionistahús.

Avleiðingin av eini íløgu uppá 30.000,- kr. í miðal pr. hús, har hendan verður nýtt á rættan hátt til orkubúskaparligar ábøtur, og um ein hugsar sær ábøturnar fíggjaðar við einum Húsalánsgrunnalán yvir 20 ár, verður:

Møgulig orkusparing til upphiting: $S_o = 39\%$.

Við eini miðal oljunýtslu í einum pensionistahúsið áðrenn ábøtur, sum er: $G_o = 2.510$ l/ár

og einum oljukostnað í december 1981, sum er:

$$k_o = 2{,}50 \text{ kr/l}$$

verða spardu oljuútreiðslurnar:

$$D_o = S_o/100 \times G_o \times k_o = 2.447 \text{ kr/ár.}$$

Eykaavgjald fyri oljuráevni er:

$$t_o = 5\%$$

og verður sparda gjaldoyra pr. hús til oljuflutning:

$$D_s = 2.330 \text{ kr/ár.}$$

Gjaldoyra til innflutning av timbri og bjálving umfram arbeiðsløn, tá tollur ikki verður roknaður av innfluttu vørunum er: K = 26.000,- kr.
Avdráttartíðin er: N = 20 ár.
Rentan er: r = 7% p.a.
Annuitetslán.
Rentur og avdráttur pr. ár er: R = 2.450,- kr.

Og verður tann veruliga landsbúskaparliga meirútreiðslan R — D_s = 120 kr/ár við galdandi oljuprísum.

b = 4% p.a.

Meðan ein realprishækking uppá 2% p.a. gevur um 50% prishækking eftir 20 árum, gevur 4% p.a. um 120% veruliga prishækking í hesum tíðarskeiði og kann hetta tykjast heldur nógv. Men tá sæð verður aftur um bak, hvørt 8 ár, hevur realprishækkingin á olju í hesum tíðarskeiði verið meira enn 120%. Tí verður mett, at eisini b = 4% p.a. eigur at verða tikið við í hesi búskaparligu meting.

Úrslitið er, at akkumuleraða núvirðið av spardu útreiðslunum til upphiting í hesum 20-ára skeiði er støðugt vaksandi frá 3.350,- kr,, tá iløgan er 10.000,- kr., til 10.700,- kr., tá iløgan er 60.000,- kr. Hetta merkir, at um oljuprísgongdin veruliga verður b = 4% p.a., er tað landsbúskaparliga rætt at gera iløgur upp til 60.000,- kr.

5. NIÐURLØGA.

Við útgangsstøði í húsabyggingini á Sandi og seinastu íbúðaruppgerðini hjá Danmarks Statistik frá 1977, verður mett, at av teimum 8.700 húsunum, sum vóru bygd í Føroyum fram til 1966/67, eiga pensionistar tey o.u. 2.100.

Hesi pensionistahús kunnu, alt eftir upprunaliga byggihátti, býtast upp í 7 flokkar.

Fyri hvønn flokkin er síðan kannað, hvørjir møguleikar eru at gera bygningsábøtur, ið kunnu minka um orkunørvin til upphiting, hvat hesar ábøtur kosta og hvussu orkunýtslan verður ávirkað av hesum ábótum.

Við einum tílíkum yvirliti yvir ábøtur og ávirkan av hesum er møguligt at seta upp eitt rímuligt samanhang millum iløgu til ábót og møguliga orkusparing í einum miðal pensionistahúsi, bygt áðrenn 1966/67.

Ástøðiliga oljunýtslan til upphiting av einum miðal pensionistahúsi í dag skuldi verið um 6.300 l/ár, um roknað verður við einum innandura hitastigi, sum er 20°C, men orsakað av, at pensionistar spara og tí bert nýta ein lítlan part av húsinum í tí dagliga, er miðal oljunýtslan ístaðin um 40% av hesum, ella 2.510 l/ár í miðal.

Hetta merkir, at um ein ávís ábót verður gjørd á eitt tílíkt hús, kann bert roknast við eini lutfalsligari oljusparing, samsvarandi veruligu oljunýtsluni (2.510 l/ár).

5.1. LANDSBÚSKAPARLIG ÍLØGA.

Tá talan er um ábøtur á hús, verður mett, at avskrivingartíðin skal roknast at vera 20 ár, og tá metast skal um landsbúskaparligu iløguna, verður rentan roknað sum realrentan (marknaðarrentan - inflatiónina). Realrentan er í útrokningunum sett at vera 7% p.a., sum, við eini marknaðarrentu 15% p.a. og inflatión, ið er 8% p.a., er gott samsvarandi veruleikanum.

Við hesum fortreytum og treytað av realprisgongdini fyri olju tey næstu 20 árini, er tað landsbúskaparliga rætt at gera iløgur til orkusparandi tiltøk upp til 60.999,- kr., um realprisgongdin fyri olju verður 2% p.a. ella meira, meðan tað ikki fyri hendan bólkin av húsum sýnist, sum nøkur landsbúskaparlig góð loysn, um eingin realprishækking fyri oljuna fer fram í hesum tíðarskeiði. Hetta síðsta kemst av, sum áður nevnt, at pensionistar bert nýta ein part av húsinum í tí dagliga, og verður møguliga oljusparingin lutfalsliga lítil í mun til neyðugu iløgurnar til orkusparandi ábøtur.

Onki er tó, sum bendir á, at realprisurin fyri olju brádliga fer at »stagnera«, og um realprisgongdin kanska ikki verður so stór sum hesi seinastu árini, verður mett, at ein realprísgongd fyri olju, sum í miðal verður 2% p.a., er rímuligt at rokna við. Verður roknað við hesum, verður tað ein landsbúskaparligur fyrimunur at gera iløgur upp til 60.000,- kr., men størsti ágóðin í hesum 20-ára skeiði fæst tá við eini iløgu um 30.000,- kr. til eitt miðal pensionistahús.

Núvirðið av samlaðu sparingini verður tá um 2.900,- kr. pr. hús.

5.2. ÁVIRKAN AV ÍLØGUNI.

Verða iløgur til orkusparandi tiltøk, um 30.000,- kr., lagdar í eitt miðal pensionistahús og livihátturin annars ikki verður broyttur, t.e. at húsini, eftir eina ábót, ikki verða meira upphitað enn vanligt, kann roknast við eini oljusparing um 980 l/ár pr. hús av hesum slag.

Hetta førir við sær, at oljuútreiðslurnar minka við 2.450,- kr/ár, roknað í dagsprísum (december 1981).

Neyðugt verður eisini at gera eina samanseting við tann stuðulshættin, ið hevur verið nýttur, nevniliga at veita stuðul til keyp av olju (900 kr/ár).

Landsbúskaparliga sæð minkar oljuinnflutningurin við 980 l/ár, og verður sparda

gjaldoyra, ið stendst av hesum, tá eykaavgjald (5%) ikki iroknað, um 2.330,- kr/ár. Hinvegin skulu rentur og avdráttur gjaldast av íløguni, sum gjørd verður (30.000,- kr.), og er hendan upphædd, tá tollur ikki er iroknaður fyri tilfar, 2.450,- kr/ár, um íløgan verður býtt út á avskrivingartíðina eftir annuitetsháttinum, við realrentuni 7% p.a. Veruligu útreiðslurnar verða tá 120,- kr/ár, um oljuprísurin er sum í december 1981.

Ein tílík loysn kann sostatt koma pensionistinum nógv meira til hjálpar enn tær 900,- kr/ár í oljustudningi, samstundis sum landsbúskapurin fær 780,- kr. til góðar í mun til at lata tær 900,- kr. í oljustudningi.

5.3. HEILDARMYND.

Ráðið metir tað at vera av stórum týdningi, at hetta mál ikki verður avmarkað til pensionistaíbúðir burturav, sum jú bert eru um 2.100 í tali í mun til um 6.600 onnur hús, sum eru bygd áðrenn 1966/67, og tí eisini lítið og onki bjálvað.

Harumframt kann roknast við, at fleiri fólk búgva í hvørjum av hesum húsum, og tí brúka størri part av húsinum og harvið meira orku til upphiting.

Umframt sethús, eru aðrir størri orkubrúkarar til upphiting, so sum skrivstovubygningar, skúlar, hospital, svimjihallir o.a.

Verða tølini fyri oljunýtsluna í árinum 1980/81 sett upp fyri ymisku brúkararnar, verður úrslitið sum mynd 5-1, á næstu síðu, vísir.


Samlaða oljunýtslan, iroknað tað, ið skipini keypa uttanlands, var í 1980/81 um 184.000 tons.

Av hesum sæst, at samlaða oljunýtslan til upphiting í sethúsum (incl. størri brúkarar) í 1980/81 var um 38.600 tons.

Verða skilagóð orkusparandi tiltøk gjørd fyri 30.000,- kr. í miðal pr. pensionistahús, bygt áðrenn 1966/67, verður møguligt at spara um 1.750 tons av olju pr. ár, tá roknað verður við 2.100 húsum.

Hetta svarar til um 4,5% av samlaðu oljunýtsluni til upphitingarendamál ella minni enn 1% av samlaðu oljunýtsluni.

Neyðugu íløgurnar, ið skulu gerast fyri at fáa hesa oljusparing, verða um 63 mió. kr.



Mynd 5-1. *Yvirlit yvir samloðu oljunýtsluna í Føroyum í 1980/81.*

Oljumøgd: 164.000 tons incl. keypt útlondis.

ANNAÐ: er t.d. petroleum, smyrjiolja o.a.l.

Sjálvt um tað er landsbúskaparliga rætt at gera omanfyri nevndu iløgur, metir ráðið, at góðir møguleikar eru at gera onnur orkusparandi tiltøk, sum við minni iløgum kunnu spara enn meira olju til upphitingarendamál.

Endamálið við tí arbeiði, sum Orkuráðið ger á hesum øki, er at fáa greiðu á, hvørji tiltøk fyrst eiga at verða framd, hvat hesi krevja í iløgum og hvussu stóra oljusparing roknast kann við. Eisini arbeiðir ráðið við einum uppskoti til reglugerð í sambond við bjálving og tetting av húsum.

SKJAL TIL LØGTINGSMÁL NR. 132:
SKIPAN MILLUM FØROYAR OG SOVJETSAMVELDIÐ,
UM SÍNAMILLUM FISKIRÆTTINDI Í 1982.

SKJAL 16

Váttað frásøgn

frá 5. fundinum í føroysk-sovjettisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál

I. Eftir innbjóðing og sambært sáttmálan frá 27. november 1977 millum stjórn Sovjetsamveldisins øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin um sínámillum fiskirættindi Føroyar-Sovjetsamveldið var fimti fundurin í føroysk-sovjettisku felagsnevndini hildin í Moskva í døgunum 24.-26. september 1981.

II. Á odda fyri umboðini á fimta fundi í føroysk-sovjettisku felagsnevndini um sínámillum fiskivinnumál stóðu ávikavist P. Ellefsen, Føroya Løgmaður og V.M. Kamentsev, fiskivinnumálaráðharri Sovjetsamveldisins. Eisini luttók Olaf Olsen, fiskivinnumálaráðharri Føroya.

Sum umboð fyri partarnar í føroysk-sovjettisku felagsnevndini luttóku:

Frá Sovjetsamveldinum: Ye. I. Zaitsev — tiltaksmaður fyri umboðið hjá Sovjetsamveldinum í felagsnevndini.

Frá Føroyum: Árni Olafsson, umboð hjá Føroya Landsstýri í felagsnevndini.

Hjalti í Jákupsstovu, umboð hjá Føroya Landsstýri í felagsnevndini.

Á fimta fundi í felagsnevndini luttóku tey í skjali I nevndu umboð og serfrøðingar frá Sovjetsamveldinum og Føroyum.

Tá ið fundurin varð settur, helt V.M. Kamentsev, fiskivinnumálaráðharri Sovjetsamveldisins, røðu og beyð luttakarunum vælkomnum. P. Ellefsen, Føroya løgmaður, helt røðu og takkaði fyri móttøkuna.

III. Aftaná samráðing samtykti felagsnevndin hesa dagsskrá:
1. Fundarseta

2. Samtykt av dagsskrá
3. Frágreiðing um sínámillum fiskiveiðu partanna í 1981
4. Frágreiðing um sínámillum royndarfiskiskap og fiskiroyndir partanna í 1981
5. Umrøða av úrslitum higartil av royndarfiskiskapi eftir makreli hjá sovjettiskum skipum í føroyskum sjógvi í 1981
6. Ásetan av kvotum fyri sínámillum fiskiskap í 1982
7. Ásetan av tali av loyvum í 1982
8. Reglurnar viðvíkjandi loyvum fyri sínámillum fiskiskapi í 1982, fráboðan frá fiskiskapi í sovjettiskum sjógvi og føroyskum sjógvi og lúkan av treytum fyri fiskiskapi
9. Umrøða av felagsætlan viðvíkjandi vísindarligum og rannsóknarligum arbeiði og viðvíkjandi royndarfiskiskapi og fiskiroyndum í 1982
10. Ymiskt
11. Fundarslit

IV. Viðvíkjandi máli 3 á dagsskránni góvu partarnir hvørjum øðrum upplýsingar um ávikavist føroysku veiðuna í 1981 í teimum pørtum av Barentshavinum og Eystrasalti, ið liggja út fyri sovjetisku strondini og sovjetisku veiðina á føroyskum sjógvi. Báðir partar tóku hesar upplýsingar til eftirtektar.

V. Í sambandi við mál 4 á dagsskránni gjørdu partarnir hvønn annan kunnugan við úrslitini av sínamillum rannsóknar- og royndarfiskiskapinum í 1981.

VI. Viðvíkjandi máli 5 á dagsskránni greiddu sovjetisku umboðini frá fyribilsúrslitum av teirra royndarfiskiskapi eftir makreli í 1981.

VII. Viðvíkjandi máli 6 á dagsskránni komu partarnir ásamt um at geva hvørjum øðrum hesi sínamillum fiskirættindi í 1982:

a. Føroysku myndugleikarnir loyva sovjetiskum skipum at veiða upp til 95.000 tons av svartkjafti til matna á føroyskum fiskiøki.

b. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum at veiða upp til 14.000 tons av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu.

Av nevndu 14.000 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, skulu 1.000 tons verða veidd í teimum pørtum av Barentshavinum, sum liggja úti fyri sovjetisku strondina, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar, 3.000 tons í teimum pørtum av Eystrasalti, ið liggja út fyri sovjetisku strondina, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar.

Føroysku myndugleikarnir fáa seinni boð um tær leiðir, har loyvt er at fiska frestandi 10.000 tonsini av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu.

(Sovjetisku myndugleikarnir loyva eisini føroyskum skipum at fiska upp til 20.000 tons av lodnu)

Í teimum pørtum av Barentshavinum, ið liggja út fyri sovjetisku strondini, og sum eru undir sovjetiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðfjórðingar.

VIII. Viðvíkjandi máli 7 á dagsskránni samtyktu partarnir hetta:

a. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum alt árið 1982 at veiða tosk, hýsu og lodnu í teimum pørtum av Barentshavinum og Eystrasalti, ið eru undir sovjetiskari lóggávu.

b. Føroysku myndugleikarnir loyva 14 sovjetiskum skipum at veiða svartkjaft í føroyskum fiskiøki í tíðarskeiðinum januar til september 1982 og 8 sovjetiskum skipum í tíðarskeiðinum oktober til december 1982.

IX. Viðvíkjandi máli 8 á dagsskránni varð hetta nevnt:

a. Báðir partar gjørdu hvønn annan kunnugan við tær reglur, ið galda fyri føroyskar og sovjettiskar fiskimenn, ið veiða á økjum undir ávikavist føroyskari lóggávu og undir sovjettiskari lóggávu í Eystrasalti og Barentshavinum.

b. Báðir partar ansa eftir at skip teirra halda tær lógir og reglur, ið galda fyri veiðu á økjum, ið eru undir lóggávu hjá hinum partinum. Serligar reglur kunnu verða settar í verk í mai og juni viðvíkjandi svartkjaftafiskiskapinum á føroyskum fiskiøki. Hetta verður gjørt fyri at sleppa undan troðkan, meðan fiskiskapurin fer fram í einum lutfalsliga avmarkaðum øki.

c. Viðvíkjandi mannagongdini at geva loyvi til skip til sínámillum fiskiskap á økjum undir sovjettiskari og føroyskari lóggávu komu partarnir ásamt um, at teir fyri árið 1982 skulu senda yvirlit yvir tey skip, talan er um, ikki seinri enn 15 dagar áðrenn fiskiskapurin skuldi byrja.

d. Partarnir komu ásamt um, at neyðug umbøn um umskiftan av loyvum til skip skal fara fram yvir telex, ið verða send til Murmansk, Riga ella Tórshavn.

e. Báðir partar skulu nýta telex til loysn av øllum operativum spurningum í sambandi við sínámillum fiskiskapin.

f. Partarnir eru komnir ásamt um, at skipini í samband við loyvisspurningar helst skulu nýta Murmansk, Riga ella Tórshavn sum atløguhavn.

X. Viðvíkjandi máli IX á dagsskránni komu partarnir ásamt um fylgjandi:

Føroyskir myndugleikar geva sovjettiskum skipum loyvi til royndarfiskiskap í føroyskum fiskiøki djúpri enn 700 metur. 3 skip kunnu fáa loyvi samstundis.

Frá føroyskari síðu verður loyvt einum av teimum trimum omanfyrinevndu skipum at reka djúphavsroyndarfiskiskap, íroknað dýpið millum 5-700 metur rundanum Outer Bailey Bankan, tó so at har hægst verður veitt 200 tons av fiski.

Føroysku myndugleikarnir loyva 1-2 sovjettiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli á føroyskum fiskiøki, undantikið stongd øki, í tíðarskeiðinum mai-september 1982. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða makrelveiðan skal ikki fara upp um 2.000 tons.

Sovjettisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir rækjum í teimum pørtum av Barentshavinum, ið liggja út fyri sovjettisku strondini, og sum eru undir sovjettiskari lóggávu uttan fyri 12 fjórðingar.

Báðir partar skulu tranmanundan gjøgnum telex geva hvørjum øðrum boð um ætlanir fyri nevnda royndarfiskiskapi.

XI. Í sambandi við mál 10 á dagsskránni, Ymiskt, søgdu partarnir frá, at teir kundu ynskt eitt nærri vísindarligt samstarv, og í hesum sambandi luttøku í millumlanda vísindaligum samstarvi viðvíkjandi svartkjafti.

Viðvíkjandi atlanto-skandiskari síld eru partarnir samdir um at boða frá einum og hvørjum tilburði av veiði av hesum fiskaslagi undir fiskiskapi, royndarfiskiskapi ella havrannsóknum í fiskiøkjunum hjá hvørjum øðrum.

Partarnir hava í hyggju at umskifta sendinevndir av serfrøðingum innan fiskihættir og viðgerð av fiski.

Partarnir eru samdir um á 6. fundi í felagsnevndini at meta um tey úrslit, ið komin eru burtur úr øðrum samstarvi av felags áhuga innan fiskivinnu.

XII. Partarnir samdust um, at felagsnevndin skuldi halda 6. fund sín í Føroyum í seinnu helvt av 1982.

Skráin fyri 6. fund felagsnevndarinnar skal verða løgd til rættis gjøgnum stjórnarumboð.

Henda frásøgn er skrivað í Moskva (USSR) tann 25. september 1981 á føroyskum, donskum og russiskum.

Umboð fyri Føroyar í felagsnevndini:	Tiltaksmaður fyri Umboð fyri stjórnina í Samveldinum av Sosialistiskum Sovjetrikjum í felagsnevndini:
Árni Olafsson (sign.)	Ye. I. Zaitsev (sign.)
(Árni Olafsson)	(Ye. I. Zaitsev)

ambassaden i moskva, amtel 112 af 2. marts 1982 kl. 1130

u r g e n t

uklassificeret

bedes af koncentret straks retelexet til faeroernes landsstyre i torshavn.

overfoerset af den resterende del af den faeroeske torskekvota i barentshavet.
amtel 118 af gaars dato
um. j.nr. oep.4. 63. faeroeerne-sovjet
amb.j.nr. 63.d.1/faeroerne

som svar paa ambassadens p.m. af 21. februar 1982 (baseret paa amtel 237 af 23. februar 1982) har det sovjetiske fiskeriministerium fremsendt en ultrakort note, hvori ministeriet erklaerer sig »enig i indholdet af p.m.et«

det faeroeske forslag om at holde overfoerslen til oestersoen af de 1.100 tons torsk i option, er saaledes accepteret fra sovjetisk side.
slut slut

pav/eh viggo nedergaard jensen 112

81235 tingns fa
312921 etr jk

SKJØL TIL LØGTINGSMÁL NR. 143:
BROYTING Í STUÐULSSKIPANINI
TIL FISKIVINNUNA

SKJAL 17 A

Fiskivinnuráðið
Tinganes
Tórshavn

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn

Fiskivinnuráðið hevur í álitinum dagfest tollaksmessudag 1981 víst á, at við galdandi stuðulsskipan verður tørvurin á stuðli hjá heimafiskiflotanum góðar 30 mill. kr. minni í 1982 enn árið fyri.

Ráðið hevur síðani viðgjørt málið av nýggjum og er komið til ta niðurstøðu at mæla Føroya Landsstýri til at gera hesar broytingar í stuðulslóggávuni:

1) Játtanin til Ráfiskagrunnin verður komandi fíggjarár lækkað við 10 mill. kr., tó við ti treyt at avreiðingarprísirnir ikki verða lækkaðir.

2. The adoption of an amendment by the Council shall require the unanimous vote of the Parties present and casting an affirmative or negative vote. The text of an amendment so adopted shall be transmitted by the Secretary to the Depositary which shall immediately notify the Parties thereof.

3. An amendment shall enter into force for all Parties 30 days after the date specified in the notification by the Depositary of receipt from all Parties of instruments of ratification or approval.

4. A Party which becomes bound by this Convention after an amendment has entered into force in accordance with paragraph 3 shall be considered as a Party to the Convention as amended.

5. The Depositary shall immediately notify all Parties of the receipt of instruments of ratification or approval and the entry into force of amendments.

ARTICLE 20

1. Any Party may denounce this Convention with effect from 31 December of any year by giving notice to the Depositary on or before the preceding 30 June. The Depositary shall immediately inform the other Parties of such denunciation.

2. Any other Party may denounce this Convention with effect from the same 31 December by giving notice to the Depositary within 30 days of the date on which the Depositary informed the Parties of a denunciation under paragraph 1.

ARTICLE 21

1. The original of this Convention shall be deposited with the Council of the European Communities, referred to in the Convention as the »Depositary«, which shall transmit certified copies thereof to all signatories and acceding Parties.

2. The Depositary shall register this Convention in accordance with article 102 of the Charter of the United Nations.

IN WITNESS WHEREOF the undersigned, being duly authorized thereto, have signed this Convention.

OPENED FOR SIGNATURE at Reykjavik on 2 March 1982, in a single original, in the English and French languages, both texts being equally authoritative.

SKJAL 2
SKJAL 18 B

Statement of the representative of Faroese Home Goverment:

By participating in the signing of the Final Act of 22nd January of the Diplomatic Conference on the Conservation of Salmon in the North Atlantic Ocean, the Home Goverment of the Faroe Islands accept the Convention text drawn up by the Conference as a useful basis for the establishment of cooperation between the parties on salmon stocks of mutual interest.

However, before seeding on signing the Convention itself further study vill be made concerning its implications including the probability that participation in its activities may serve to protect a small society dependtent upon good and stable relations to other countries bordering on the Convention area, from being subject to undue bileteral pressures through linkages of salmon issues with other questions of vital importance for the Faroe Islands.

SKJAL 3
SKJAL 18 C

Statement by the representative of the Faroese Home Goverment concerning salmon fishing

1. Faroese authorities are aware of the worries raised in some quarters on recent developments in Faroese salmon fishing.

2. The Faroese authorities recognise that the salmon occuring in Faroese waters also are of interest to other countries and are willing to take part in international cooperation on the management of these salmon stocks. Faroese scientists are playing an active part in scientific cooperation on this subject in the frame-work of ICES.

3. In order to demonstrate its readiness to protect the stocks concerned, the Faroese Home Goverment intend, as a precauticnary measure, to take the steps necessary to ensure, that the quantity of salmon caught in the offshore salmon fishery in the fishery zone of the Faroe Islands, and by Faroese vessels outside the zone, in the season October 1981 to June 1982 and in the season October 1982 to June 1983 does not exceed the quantity of 1.065 tons caught in the season October 1980 to June 1981.

4. Furthermore, the Faroese authoritics are ready to take the steps necessary to reduce the salmon catch by 300-400 tons in the season 1982/83 compared to the 1980/81 season, the figure in 1981/82 for practical reasons being aproximately 100 tons higher (minus 200-300 tons compared to 1980/81). The possibility of the implementing these reductions will depend upon an assessment of Faroese fishing needs, and will therefore not be put into effect until bilateral agreements concerning important Faroese fisheries in the fishery zones of other Parties have been brought to a successful conclusion.

Umseting av føroysku yvirlýsingunum í sambandi við undirskriving av almennu fundarfrágreiðingini í Reykjavík 22. januar 1982.

Umseting av skjali 2:

I. Yvirlýsing frá umboðnum fyri Føroya landsstýri:

Við luttøku síni í undirskrivingini av almennu frágreiðingini frá 22. januar 1982 frá sendinevndarfundinum um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavi, góðtekur Føroya landsstýri tann sáttmálatekst, sum fundurin hevur orðað, sum eitt nýtiligt grundarlag fyri at fáa í lag samvinnu partanna millum um laksastovnar av felags áhuga.

Áðrenn avgerð verður tikin um undirritan av sjálvum sáttmálanum verður tó neyðugt nærri at kanna avleiðingarnar av honum, harímillum í hvat mát luttøka í virkseminum undir honum kann metast at tæna til at verja eitt lítið samfelag, ið hevur brúk fyri góðum og varandi viðurskiftum við onnur lond, ið hava strendur við sáttmálaøkið, ímóti órímuligum trýsti við samanknýting í tvísíðaðum samráðingum av laksaspurninginum við aðrar spurningar av lívstýdningi fyri Føroyar.

Umseting av skjali 3:

II. Yvirlýsing frá umboðnum fyri Føroya landsstýri viðvíkjandi laksafiskiskapi:

1. Føroyskir myndugleikar eru varir við, at gongdin í føroyska laksafiskiskapinum í seinastuni hevur vakt ampa ymsastaðni.

2. Føroysku myndugleikarnir viðurkenna, at laksurin, sum gongur í føroyskum sjógvi, eisini er av áhuga fyri onnur lond, og vilja teir taka lut í millumtjóða samvinnu um hesar laksastovnar. Føroyskir vísindamenn taka lut í vísindaligum samstarvi um hetta evni innan karmin av ICES.

3. Til tess at vísa, at Føroya landsstýri er til reiðar at varðveita viðkomandi stovnar, ætlar tað, sum eitt fyribyrgjandi tiltak, at taka neyðug stig til at tryggja, at nøgdin av laksi, ið veidd verður í havfiskiskapinum eftir laksi á fiskiøki Føroya og av føroyskum førum uttan fyri fiskiøkið, í veiðiskeiðinum oktober 1981 til juni 1982 og í veiðiskeiðinum oktober 1982 til juni 1983 ikki fer upp um ta nøgd uppá 1065 tons, ið veidd varð í veiðiskeiðinum oktober 1980 til juni 1981.

4. Harumframt eru føroysku myndugleikarnir til reiðar at taka neyðug stig til at minka laksaveiðuna við 300-400 tons í skeiðinum 1982/83 samanborið við 1980/81-skeiðið, meðan talið fyri 1981/82 av praktiskum orsøkum verður umleið 100 tons hægri (200-300 tons lægri enn 1980/81). Møguleikin fyri at gjøgnumføra hesar niðurskurðar er bundin at eini meting av føroyska tørvinum, og teir verða tí ikki

settir i verk fyrrenn tað hevur eydnast at gera tvísíðugar avtalur viðvíkjandi týdningarmiklum føroyskum fiskiskapi á fiskiøkinum hjá øðrum luttakarum.

SKJAL 18 E

Umseting: **Ad løgtingsmál nr. 160/1981: Góðkenning av sáttmála um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum.**

Endalig samtykt hjá ráðstevnuni viðvikjandi varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum.

Reykjavík, 18. til 22. januar 1982.

Ein ráðstevna varð hildin í Reykjavik frá 18. til 22. januar við tí endamáli at tilevna orðingina í sáttmála um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum.

Ráðstevnan varð samankallað eftir innbjóðing frá íslendsku stjórnini.

Fylgjandi vóru umboðað á ráðstevnuni: Kanada, Danmark vegna Føroyar, Europeiski Búskaparligi Felagsskapurin, Ísland, Noreg, Svøriki og Sambandsríkið Norðuramerika.

Ráðstevnan valdi harra Gudmund Eiriksson (Ísland) til fundarstjóra og Janus A.W. Paludan, sendiharra (Danmark vegna Føroyar) og Mr. Larry L. Snead (USA) til varafundarstjórar.

Ráðstevnan góðtók fulltrúaváttanirnar hjá umboðunum.

Ráðstevnan góðtók aftaná samráðingar ein sáttmála um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum við atkvøðu frá fylgjandi:

Kanada, Danmark vegna Føroyar, Europeiski Búskaparligi Felagsskapurin, Ísland, Noreg og Sambandsríkið Norðuramerika.

Orðingin í sáttmálanum er hjáløgd sum skjal til hesa endaligu samtykt.

Ráðstevnan samdist um, at sáttmálin ikki umfataði Eystrasalt, sum avmarkað í sáttmálanum frá 13. december um veiðu og varðveiting av fiskirikidømunum í Eystrasalti og Beltunum.

Depositarurin ger eina orðing til sáttmálan á fronskum, ið skal góðkennast av teimum pørtunum, ið lutróku í samtyktini av sáttmálanum.

Sáttmálin skal vera opin fyri undirriting í Reykjavik frá 2. mars til 31. august 1982.

Ráðstevnan takkaði íslendsku stjórnini hjartaliga fyri, at hon hevði samankallað ráðstevnuna, fyri at hava lagt arbeiðið hjá ráðstevnuni soleiðis til rættis, at tað hevði gingið skjótt og væl og fyri ovurstóran blíðskap.

Til staðfestingar hava umboðini undirskrivað hesa endaligu samtykt.

Skrivað í Reykjavik tann 22. januar 1982 í einum eintaki á enskum.

Frumritið verður handað Ráðnum fyri Europeiska Búskaparliga Felagsskapinum til varðveitslu, ið sendir váttað avrit til teir partar, ið vóru umboðaðir á ráðstevnuni.

Formaður
Gudmundur Eiriksson

Fyri kanadisku sendinevndina
B. Applebaum

Fyri donsku sendinevndina Føroya vegna
J. Paludan Árni Olafsson

Fyri sendinevndina hjá Europeiska Búskaparliga Felagsskapinum
M. Marcussen

Fyri íslendsku sendinevndina
Gudmundur Eiriksson

Fyri norsku sendinevndina
Björn Smörgrav

Fyri sendinevnd Sambandsríkjanna
Larry L. Snead

Sáttmáli um varðveiting av laksi í Norðuratlantshavinum.

Sáttmálapartarnir,

sum ásanna, at laksur, sum hevur sín uppruna í áunum hjá ymsum londum, kemur í bland í vissum pørtum av Norðuratlantshavinum,

sum umhugsa altjóðarætt, reglurnar viðvíkjandi anadromum fiskastovnum í uppskotinum til sáttmála hjá Triðju Havrættarstevnuni hjá Sameindu tjóðunum og gongdina annars í millumtjóða samvinnu um anadromar stovnar,

sum ynskja at fremja savnan, sundurgreining og útbreiðslu av vísindaligum tilfari viðvíkjandi laksastovnum í Norðuratlantshavinum,

sum ynskja at fremja varðveiting, endurreising, nøring og skynsama umsiting av laksastovnum í Norðuratlantshavinum við altjóða samarbeiði,

eru komnir ásamt um hetta:

Grein 1

1. Hesin sáttmáli skal galda fyri laksastovnar, ið fara út um øki, sum eru undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá strandalondunum við Atlantshavið norðan fyri 36° N alla lívsleið teirra.

2. Eingi í hesum sáttmála skal ávirka tey rættindi, krøv ella sjónarmið, sum nakar av pørtunum hevur viðvíkjandi markinum fyri og víddini av yvirvaldsrætti yvir fiskiskapi, ei heldur skal hann ávirka sjónarmið ella støðutakan hjá nøkrum av pørtunum havrætti viðvíkjandi.

Grein 2

1. Veiða av laksi er bannað uttanfyri tey øki, ið eru undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá strandalondunum.

2. Innan fyri øki undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá strandalondum er veiða av laksi bannað uttanfyri 12 fjórðingar, mált frá teimum grundlinjum, hvaðani breiddin av sjóterritoriinum er máld, uttan á fylgjandi økjum:

(a) á økinum undir nevndini fyri Vestur Grønland: út til 40 fjórðingar mált frá grundlinjunum og

(b) á økinum undir nevndini fyri Landnyrðingsatlantshavið: á landleið Føroya.

3. Partarnir skulu gera eitthvørt land, sum ikki er limur av hesum sáttmála vart við øll viðurskifti, sum hava samband við virksemi hjá skipum hjá avvarðandi landi, ið kann skaða varðveiting, endurreising, nøring ella skynsama umsiting av laksastovnum undir hesum sáttmála ella útinningina av hesum sáttmála.

Grein 3

1. Ein altjóða felagsskapur verður settur á stovn undir heitinum Felagsskapurin til varðveiting av laksinum í Norður Atlantshavinum, eftir hetta kallað »Felagsskapurin«.

2. Endamálið hjá »Felagsskapinum« skal vera við samráðingum og samarbeiði at vera við til varðveiting, endurreising, nøring og skynsama umsiting av laksastovnunum, ið eru undir hesum sáttmála, og skal hetta byggja á tað besta vísindarliga grundarlag, ið er honum til taks.

3. Felagsskapurin verður samansettur av

a) einum ráði,

b) trimum økisnevndum:

eini nevnd fyri Norðurameriku

eini nevnd fyri Vesturgrønland og

eini nevnd fyri landnyrðings-Atlantshavið, og

c) einum skrivaraembæti.

4. Nevndirnar skulu umfata hesi øki:

a) nevndin fyri Norðurameriku: Sjógvurin innan økið undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá strandalondunum við eystursstrond Norðurameriku,

b) nevndin fyri Vesturgrønland: Sjógvurin innan øki undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi við Vesturgrønlendsku strondina vestan fyri eina linju, drigin fram við 44° vesturlongd suður til 59° norðurbreidd, haðani beint eystureftir til 42° vesturlongd og haðani beint suðureftir,

c) nevndin fyri landnyrðings-Atlantshavið: Sjógvurin eystan fyri linjuna nevnd í litra b).

5. Felagsskaðurin skal vera ein løgfrøðiligur persónur og skal á økjum hjá sáttmálapørtum og í viðurskiftum við aðrar altjóða felagsskapir hava ta rættarstøðu, ið neyðug er, til tess at kunna útinna virksemi sitt og náa endamál sini. Tann verja og tey frammihjárættindi, felagsskapurin, embætismenn og starvsfólk hans og umboð sáttmálapartanna skulu hava á økinum hjá eitnum landi verða ásett við sáttmála millum felagsskapin og avvarðandi land.

6. Almennu málini hjá felagsskapinum skulu vera enskt og franskt.

7. Felagsskapurin skal hava skrivstovu í Edinburgh ella á øðrum stað, ið Ráðið ásetir.

Grein 4

1. Ráðið skal hava hesar uppgávur:

a) at vera forum fyri kanning, gransking og býti av upplýsing partanna millum um mál viðvikjandi teimum laksastovnum, ið eru undir hesum sáttmála og fyri at náa endamálið hjá hesum sáttmála,

b) at vera forum fyri sainráð og samvinnu í spurningum viðvikjandi teimum laksastovnum í Norðuratlantshavi, uttan fyri sáttmálaøkið,

c) at lætta um samskipan av arbeiði nevndanna og at samskipa tiltøk partanna samb. gr. 2, petti 3.

d) at seta á stovn samarbeiði við Millumlanda Ráðið fyri Havrannsóknir ella aðrar hóskandi fiskivinnu- og visindaligar felagsskapir,

e) at gera tilmæli partarnar, Millumlanda Ráðið fyri Havrannsóknir ella aðrar hóskandi fiskivinnu- og visindaligar felagsskapir viðvikjandi visindaligum kanningum,

f) at hava umsjón og samskipa tey fyrisitingarligu, figgjarligu og onnur innanhýsis viðurskifti í felagsskapinum, herundir sambandið millum teir stovnar, ið hann er samansettur av,

g) at samskipa samband felagsskapsins úteftir og

h) at fremja tær uppgávur, sum annars verða álagdar honum við hesum sáttmála.

2. Ráðið skal hava heimild til at gera tilmæli til sáttmálapartarnar og til økisnevndirnar um spurningar viðvikjandi laksastovnum undir hesum sáttmála, herundir uppihalding av lógum og kunngerðum, treytað av at einki tilmæli verður

givið viðvíkjandi umsitinginí av laksafiskiskapinum innan økið undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá einum parti.

3. Hóast petti 2 hevur ráðið eftir serstakligari áheitan frá eini nevnd myndugleika at gera tilmæli til avvarðandi nevnd um tiltøk, sum nevndin kann skjóta upp sambært hendan sáttmála.

Grein 5

1. Hvør av sáttmálapørtunum skal vera limur í raðnum og kann til raðið velja í mesta lagi 3 umboðsmenn, sum kunnu hava serfrøðingar og ráðgevarar við á fundirnar

2. Ráðið skal velja ein formann og ein varaformann, sum hvør skal virka í einum 2 ára tíðarskeiði. Teir skulu hava rætt til at verða afturvaldir, treytað av, at teir ikki virka í nøkrum starvi í meira enn 4 ár á rað. Formaðurin og varaformaðurin mugu ikki umboða sama sáttmálapart.

3. Formaðurin fyri ráðnum er høvuðsumboðsmaður fyri felagsskapinum.

4. Formaðurin skal boða ráðnum og nevndunum til ein regluligan fund eina ferð um árið til ta tíð og á tí staði, ráðið hevur ásett.

5. Umframt ársfundirnar boðar formaðurin eftir áheitan frá einum parti, ið verður styðjaður av einum øðrum parti, til fundar til tíð og á stað, hann sjálvur hevur ásett.

6. Ráðið sendir pørtunum eina ársfrágreiðing um virksemi felagsskapsins.

Grein 6

1. Ráðið viðtekur reglugerð sína.

2. Hvør limur av ráðnum hevur eina atkvøðu á ráðsfundi.

3. Uttan so, at annað er ásett, skulu avgerðir í ráðnum takast við 3/4 meiriluta av atkvøðunum av teimum limum, sum eru til staðar og greiða atkvøðu fyri ella ímóti. Atkvøða skal ikki greiðast, uttan so at 2/3 av limunum eru til staðar.

Grein 7

1. Nevndin fyri Norðurameriku hevur hesar uppgávur í øki sínum:

a) at vera forum fyri ráðleggingum og samvinnu partanna millum:

i) viðvíkjandi spurningum í samband við at minka um fiskiskapin á einum øki, ið hoyrir undir yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi hjá einum limi, av laksi, ið hevur uppruna í áum hjá einum øðrum parti, og

ii) í teimum førum, tá ið virksemi, sum verður útint ella skotið upp av einum limi, skaðar laksin, ið hevur uppruna í áum hjá einum øðrum limi, t.d. orsakað av lívfrøðiligum sambandi,

b) at skjóta upp fyriskipanir um laksaveiðu á økjum undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá einum limi, sum veiðir nøgdir, ið hava týdning fyri annan lim, frá hvørs áum hesin laksur hevur sín uppruna, til tess at minka slíka veiðu,

c) at skjóta upp fyriskipanir um laksaveiðu á øki undir yvirvaldsrætti fiskiskapi

viðvikjandi hjá einum limi, sum veiðir nøgdir av týdningi hjá øðrum parti, úr hvørs áum hesin laksur hevur sín uppruna, og

d) at gera tilmæli til ráðið viðvikjandi vísindaligum kanningum.

2. Hvør av limunum skal seta neyðug tiltøk í verk viðvikjandi sínum skipum og øki, ið hoyrir undir hansara yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvikjandi, til tess at minka um hjáveiðu av laksi, ið hevur sín uppruna í áum hjá hinum liminum.

3. Fiskimynstrið í laksafiskiskapinum í ti øki, ið hoyrir undir nevndina fyri Norðurameriku, skal ikki verða broytt á eitt hátt, ið ber við sær nýggjan fiskiskap ella øking í veiðuni eftir laksi, ið hevur sín uppruna í áum hjá einum øðrum parti, uttan so at hesin játtar tí.

Grein 8

Nevndin fyri Vesturgrønland og nevndin fyri Landnyrðingsatlantshavið hava hesar uppgávur á økjum teirra:

a) at vera forum fyri samráðingar og samarbeiði millum limirnar um varðveiting, endurreising, nøring og skynsama fyrisiting av teim laksastovnum, sum eru undir hesum sáttmála.

b) at skjóta upp fyriskipanir um fiskiskap í økinum, ið er undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvikjandi hjá einum av limunum, av laksi við uppruna í áunum hjá øðrum sáttmálapørtum.

c) at koma við áheitanum til ráðið um vísindaligar kanningar.

Grein 9

Tá ið uppgávurnar í grein 7 og 8 verða greiddar, skal ein nevnd hava hetta í huga:

a) tær bestu upplýsingar, ið eru til taks, heruppií tilráðingar frá Millumlanda Ráðinum fyri Havrannsóknum og øðrum viðkomandi vísindaligum felagsskapum,

b) framd tiltøk og onnur mál bæði innan- og uttanfyri nevndarøkið, ið ávirka avvarðandi laksastovnar,

c) tann omakur, sum upprunalondini fyri laks gera fyri at seta í verk og halda uppi tiltøk til varðveiting, endurreising, nøring og skynsama fyrisning av laksastovnunum í sínum áum og í økjum, sum eru undir yvirvaldsrætti teirra fiskiskapi viðvíkjandi, herundir tiltøk, sum eru umrødd í § 15, 5. petti, litra b),

d) nøgdina av føði, ið laksurin etur á økjum undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá teimum ávikavísu pørtunum,

e) tær lutfalsligu avleiðingar av veiðu av laksinum á ymsum stigum á hansara ferðaleið,

f) stuðul frá øðrum pørtum enn upprunalondum til varðveiting av laksastovnum, sum ferðast inn á øki undir teirra yvirvaldsrætti fiskiveiðu viðvíkjandi, við at skerja teirra veiðu av slíkum stovnum ella við øðrum tiltøkum, og

g) áhugin hjá samfeløgum, sum serstakliga eru bundin av laksafiskiskapi.

Grein 10

1. Partarnir skulu verða limir í nevndunum á henda hátt:

a) nevndin fyri Norðurameriku: Kanada og Sambandsríkið Norðurameriku.

b) nevndin fyri Vesturgrønland: Kanada, Europeiski Búskaparligi felagsskapurin og Sambandsríkið Norðurameriku.

c) nevndin fyri Landnyrðingsatlantshav: Danmark vegna Føroyar, Europeiski Búskaparligi Felagsskapurin, Ísland og Noreg.

2. Á fyrsta fundi sínum skal ráðið kanna og møguliga einmælt samtykkja at broyta samansetingina av nevndini fyri Vesturgrønland.

3. Ein partur, sum ikki er nevndur í 1. petti, litra b), kann eftir áheitan og við einmælttari samtykt í ráðnum gerast limur í nevndini fyri Vesturgrønland ella í nevndini fyri Landnyrðingsatlantshav, um so er, at tað er eitt uppruna land fyri munandi nøgdir av laksi, ið ferðast í viðkomandi nevndarøki, ella um avvarðandi partur hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvikjandi í viðkomandi øki.

4. Partar kunnu sum eygleiðarar taka lut í orðaskiftum í eini nevnd, teir ikki eru limir í.

5. Hvør limur kann til eina nevnd velja í mesta lagi 3 umboðsmenn, sum á fundum kunnu hava við sær serfrøðingar og ráðgevarar.

6. Hvør nevnd skal velja ein formann og ein varaformann, sum sita í einum 2-ára tíðarskeiði. Teir kunnu verða afturvaldir, treytað av at teir ikki sita í sama embætti í meira enn 4 ár á rað. Formaður og varaformaður mugu ikki umboða sama lim.

7. Eftir áheitan frá einum limi í einari nevnd við stuðuli frá einum øðrum limi, skal formaðurin boða nevndini til annan fund enn tann árliga, til tíð og stað, sum formaðurin ásetir.

8. Hvør nevnd skal geva ráðnum eina frágreiðing um arbeiði sítt, tá ið hetta er hóskandi.

Grein 11

1. Hvør nevnd skal viðtaka sína reglugerð.

2. Undir málsviðgerðini hevur hvør nevndarlimur eina atkvøðu. Harafturat hevur Europeiski Búskaparligi Felagsskapurin í nevndini fyri Norðurameriku rætt til at leggja fram og atkvøða um uppskot til fyriskipanir viðvikjandi laksastovnum, ið hava sín uppruna úr økjum umrødd í grein 18. Í nevndini fyri Landnyrðingsatlantshav hava Kanada og Sambandsríkið Norðurameriku hvør í sínum lagi rætt til at leggja fram og atkvøða um uppskot til fyriskipanir viðvikjandi laksastovnum, ið hava sín uppruna úr áunum í ávikavist Kanada og Sambandsríkið Norðurameriku, og sum eru at finna við Eysturgrønland.

3. Viðtøkur hjá eini nevnd skulu vera einmælt samtyktar av sáttmálapørtunum, ið eru til staðar og sum greiða atkvøðu fyri ella ímóti. Eingin atkvøðugreiðsla kann gerast, uttan so at 2/3 av teimum, ið hava rætt til at atkvøða um avvarðandi spurning, eru hjástaddir.

Grein 12.

1. Ráðið velur ein skrivara, ið stendur fyri fyrisitingini hjá felagsskapinum.

2. Skrivarin hevur til uppgávu:

a) at taka sær av fyrisiting felagsskapsins,

b) at savna inn og senda út hagtøl og frágreiðingar um teir laksastovnar, ið koma undir hendu sáttmála, og

c) røkja tær uppgávur, ið koma av øðrum fyriskipanum í hesum sáttmála, ella sum ráðið ásetir.

3. Ráðið ásetir tilnevningarkor skrivarans og starvsfólkanna.

4. Skrivarin tilnevnir starvsfólkið sambært teimum reglum og ti mannagongd, sum ráðið ásetir. Starvsfólkið er undir ábyrgd skrivarans, undir vanligum eftirliti hjá ráðnum.

Grein 13

1. Skrivarin skal uttan óneyðugt drál boða limunum í einari nevnd frá einihvørjari fyriskipan, ið skotin er upp av hesi nevnd.

2. Við fyrivarni um ásetanina í petti 3, skal ein fyriskipan, ið skotin er upp av einari nevnd smb. grein 7, petti 1, litra b ella c, ella grein 8, litra b, vera bindandi fyri limir hennara 60 dagar eftir tann dag, ið er nevndur í frásøgn skrivarans ella um seinni dagur er avgjørdur av ráðnum, á hesum degi.

3. Einhvør limur, ið hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi í einum øki, har ein fyriskipan hevði komið í gildi, kann innan 60 dagar frá tí degi, ið er nevndur í frásøgn skrivarans, mótmæla henni. Í hesum føri skal fyriskipanin ikki vera bindandi fyri nakran lim. Ein sáttmálapartur, ið hevur mótmælt, kann til eina og hvørja tíð taka mótmælið aftur. 30 dagar eftir at øll mótmæli eru tikin aftur, skal fyriskipanin vera bindandi, sambært 2. petti.

4. Eitt ár frá tí degi, ein fyriskipan verður bindandi, kann einhvør sáttmálapartur, ið hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi í einum øki, har ein fyriskipan skal galda, skrivliga til skrivaran uppsiga hana. Skrivarin skal beinan vegin boða hinum sáttmálapørtunum frá hesi fráboðan. Fyriskipanin skal halda uppat at vera bindandi fyri allar partar 60 dagar aftaná tann dag, skrivarin hevur uppsøgnina, um seinri dagur er nevndur av partinum, tá frá hesum degi.

5. Ein nevnd kann skjóta upp neyðfyriskipanir at galda áðrenn freistin, sum nevnd í petti 2 uppá 60 dagar, er runnin. Sáttmálapartarnir skulu streingja á fyri at seta fyriskipanina í verk, uttan so er, at sáttmálapartur hevur mótmælt innan 30 dagar, aftaná at nevndin hevur skotið fyriskipanina upp.

Grein 14

1. Einhvør sáttmálapartur skal stíla fyri, at slík stig verða tikin, íroknað at áleggja hóskandi revsing fyri brot, sum kunnu vera neyðug fyri at gera ásetanirnar í hesum sáttmála úrslitsgóðar og fyri at seta tær fyriskipanir í verk, ið verða bindandi fyri hann samsvarandi grein 13.

2. Hvør sáttmálapartur skal handa ráðnum eina árliga frágreiðing um virksemi hansara samsvarandi petti 1. Frágreiðingin skal sendast skrivaranum ikki seinni enn 60 dagar áðrenn árliga ráðsfundin.

Grein 15

1. Hvør sáttmálapartur skal lata ráðnum tøk veiðuhagtøl um laksastovnar undir hesum sáttmála, veiddir í hansara áum og økjum undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi við slíkum millumbili, sum ráðið kann áseta.

2. Hvør sáttmálapartur skal, tá ið ráðið krevur tað, savna og lata ráðnum onnur hagtøl viðvíkjandi laksastovnum undir hesum sáttmála, ið eru í hansara ám og øki undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi. Ráðið skal einmælt avgera, hvussu umfatandi slík hagtøl skulu vera, á hvønn hátt og hvussu ofta upplýsingarnar skulu latast.

3. Hvør sáttmálapartur skal lata ráðnum aðrar tøkar vísindarligar og hagtalsligar upplýsingar, sum tað krevur fyri at uppfylla endamálið í hesum sáttmála.

4. Eftir áheitan frá ráðnum skal hvør partur lata tí avrit av galdandi lógum, reglugerðum og ætlanum, ella tá ið tað er hóskandi samandráttir av teimum, viðvíkjandi varðveiting, endurreising, nøring skynsamari fyrisiting av teimum laksastovnum, sum eru undir hesum sáttmála, og sum eru í ám og økjum undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá sáttmálapørtunum.

5. Hvør sáttmálapartur skal árliga boða ráðnum frá:

(a) Viðtøku ella avtøku, síðan seinastu fráboðan, av lógum, kunngerðum og ætlanum viðvíkjandi varðveiting, endurreising, nøring og skynsamari fyrisiting av laksastovnum undir hesum sáttmála, og sum eru í ám og økjum, ið eru undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá sáttmálapørtunum.

(b) Eini og hvørjari skyldu, sum avvarðandi myndugleikar hava átikið sær um viðtøku ella framhaldi í einum ávísum avmarkaðum tíðarskeiði av fyriskipanum innan teirra umráði ella øki undir teirra yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi um varðveiting, endurreising, nøring og skynsama fyrisiting viðvíkjandi laksastovnum undir hesum sáttmála, og

(c) Viðurskifti innan umráði og øki undir yvirvaldsrætti fiskiskapi viðvíkjandi hjá sáttmálapørtum, sum í stóran mun kunnu ávirka laksanøgdina í stovnum undir hesum sáttmála.

6. Fráboðanirnar, nevndar í petti 5 (a), skulu verða sendar skrivaranum ikki seinni enn 60 dagar áðrenn árliga fundin hjá ráðnum. Fráboðanirnar, nevndar í petti 5 (b) og (c), skulu verða sendar til skrivaran so skjótt sum gjørligt.

Grein 16

1. Ráðið skal viðtaka eina árliga figgjarætlan fyri felagsskapin. Skrivarin skal senda pørtunum uppskot til figgjarætlan saman við eini gjaldsskrá í seinasta lagi 60 dagar áðrenn tann fundin í ráðnum, har figgjarætlanin skal viðgerast.

2. Ráðið ásetir ársgjald limanna eftir hesum reglum:

a) 30% av figgjarætlanini verður býtt javnt millum partarnar og

b) 70% av figgjarætlanini verður býtt millum partarnar í mun til uppgivna veiðu av laksi, sum hesin sáttmáli fevnir um, í ti álmanakkaári, sum endar, í mesta lagi 18 mánaðir og í minsta lagi 6 mánaðir, áðrenn figgjarárið byrjar.

3. Skrivarin gevur pørtunum boð um gjaldið hjá hvørjum einstøkum parti. Gjøldini verða at gjalda í seinasta lagi 4 mánaðir aftaná fráboðanardagin.

4. Uttan so at ráðið tekur aðra avgerð, verða gjøldini goldin í gjaldoyra hjá ti landi, har skrivstova felagskapsins er.

5. Fiin sáttmálapartur, sum sáttmálin er komin í gildi hjá í einum figgjarári, rindar ein part av ársgjaldinum fyri avvarðandi ár, roknað eftir, hvussu nógvir heilir mánaðir eru eftir í árinum tann dagin, sáttmálin kemur í gildi hjá avvarðandi sáttmálaparti.

6. Fiin sáttmálapartur, sum í 2 ár á rað ikki hevur goldið gjøld síni, hevur ikki rætt at atkvøða undir hesum sáttmála, fyrr enn hann hevur greitt skyldur sínar, uttan so at ráðið tekur aðrar avgerð.

7. Roknskapur felagskapsins verður grannskoðaður eina ferð um árið av grannskoðarum uttantífrá, sum ráðið velur.

Grein 17

1. Hesin sáttmáli skal vera opin fyri undirriting í Reykjavík frá 2. mars til 31. august 1982 av Kanada, Danmark vegna Føroyar, Europeiska Búskaparliga felagsskapinum, Íslandi, Noregi, Svøríki og Sambandsriki Norðurameriku.

2. Hesin sáttmáli skal vera treytaður av staðfesting ella samtykt.

3. Partar umrøddir í petti 1 kunnu gerast partur í sáttmálanum og, treytað av góðkenning frá ráðnum, eitthvørt annað land, sum hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi í Norður Atlantshavinum ella er eitt land, í hvørs ám laksastovnar undir hesum sáttmála hava sín uppruna.

4. Staðfestingar-, góðkenningar- ella góðtøkuskjøl skulu handast depositarinum til varðveitslu.

5. Hesin sáttmáli skal koma í gildi fyrsta dagin í mánaðinum, ið kemur aftaná at fýra partar hava latið inn teirra staðfestingar-, góðkenningar- ella góðtøkuskjøl, treytað av at millum teir fýra partarnar eru tveir partar limir av hvørjari nevnd, og at í minsta lagi annar teirra hevur yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi á nevndarøkinum.

6. Fyri hvønn part, ið staðfestir, góðkennir ella tekur undir við hesum sáttmála aftaná at latið er depositarinum til varðveitslu tey neyðugu staðfestingar-, góðkenningar- ella góðtøkuskjølini sambært petti 5, kemur sáttmálin í gildi á ti degi sáttmálin kemur í gildi ella á ti degi staðfestingar-, góðkenningar- ella góðtøkuskjølini verða latin depositarinum til varðveitslu, alt eftir hvør dagur er seinni.

7. Depositarurin skal geva øllum undirritarum og øllum upptiknum pørtum boð um staðfestingar-, góðkenningar- og góðtøkuskjøl, ið eru latin honum til

varðveitslu og skal geva undirritarunum boð um dagin, tá sáttmálin kemur í gildi, og hvørjar partar hann fevnir.

8. Depositarurin skal kalla saman fyrsta fundin hjá ráðnum og nevndunum so skjótt sum gjørligt aftaná at sáttmálin er komin í gildi.

Grein 18

Tá tað snýr seg um Europeiska Búskaparliga Felagskapin, verður hesin sáttmáli at galda fyri tey øki, har sáttmálin um stovnseting av Europeiska Búskaparliga Felagskapinum er galdandi, og sambært tær treytir, ið ásettar eru í tí sáttmálanum.

Grein 19

1. Ein og hvør sáttmálapartur kann skjóta upp broytingar í hesum sáttmála, sum ráðið skal taka til viðgerðar. Eitt broytingaruppskot verður at senda skrivaranum í seinasta lagi 90 dagar undan tí fundi, ið skotið verður upp, at tað verður viðgjørt á. Skrivarin skal beinan vegin senda pørtunum broytingaruppskotið.

2. Fyri at eitt broytingaruppskot skal verða samtykt, krevst at tað verður einmælt viðtikið av nevndarlimum, sum eru hjástaddir og sum greiða atkvøðu fyri ella ímóti. Skrivarin skal senda orðingina til eina tílíka góðkenda broyting til depositarin, sum beinan vegin gevur sáttmálapørtunum boð um hetta.

3. Ein broyting kemur í gildi fyri allar sáttmálapartar 30 dagar aftaná tann dagin, ið er fráboðaður í fráboðanini frá depositarinum um móttøku av staðfestingar- ella góðkenningarskjølum frá øllum sáttmálapørtum.

4. Ein sáttmálapartur, ið verður bundin av hesum sáttmála, aftaná at ein broyting er komin í gildi samsvarandi petti 3, verður roknaður sum partur í sáttmálanum í sínum nýggja skapi.

5. Depositarurin skal beinan vegin boða øllum sáttmálapørtum frá móttøku av frásagnum um staðfestingar- ella góðkenningarskjølum og frá broytingum, sum koma í gildi.

Grein 20

1. Ein og hvør partur kann taka seg burtur úr hesum sáttmála 31. desember við at geva depositarinum fráboðan í seinasta lagi tann 30. juni framman undan. Depositarurin skal beinan vegin boða hinum sáttmálapørtunum frá slíkari fráboðan.

2. Ein og hvør annar sáttmálapartur kann síðani taka seg burtur úr hesum sáttmála tann sama 31. desember við at geva depositarinum fráboðan innan 30 dagar aftaná at depositarurin hevur boðað sáttmálapørtunum um fráboðanina smb. petti 1.

Grein 21

1. Frumritið av hesum sáttmála verður latið ráðnum fyri Europeiska Búskaparliga

Felagskapin, í sáttmálanum nevnt »depositarurin«, til varðveitslu, sum sendir øllum undirritarum og tilstundandi sáttmálapørtum avrit.

2. Depositarurin skrásetir sáttmálan samsvarandi gr. 102 í Sáttmála Sameindu Tjóða.

Til staðfestingar av hesum hava undirritaðu, sum hava neyðuga heimild, undirritað henda sáttmála.

Greitt til undirritan í Reykjavík, tann 2. mars 1982 í einum eintaki á enskum og fronskum, og hava hesar báðar otðingar sama gildi.

Skjal til løgtingsmál nr. 163/1981:
Løgtingslóg um fritíðarundirvísing v.m.

Álit
viðvíkjandi
løgtingslóg um fritíðarundirvísing v.m.

Lagt fram av nevnd, ið var sett av Føroya Landsstýri 30. august 1972

Tórshavn 1979

Tann 30. august 1972 viðtók landsstýrið eftir tilmæli frá skúlastjórnini at seta ein arbeiðsbólk, sum skuldi gera uppskot til eina nýggja fritiðarlóggávu. Sum limir í arbeiðsbólkin valdi landsstýrið skrivaran í skúlastjórnini, A.J. Arnskov, skrivstovustjóra, Inger Christiansen, fulltrúa í landsstýrinum og Ludvig Petersen, landsskúlaráðgevara.

Sambært viðtøku landsstýrisins skipaði arbeiðsbólkurin seg sjálvan, og hann valdi á sínum fyrsta fundi A.J. Arnskov, skrivstovustjóra til formann. Bólkurin hevur havt 22 fundir.

Í 1963 legði eitt nevnd, sum Føroya Skúlastjórn hevði sett, fram eitt álit viðvíkjandi kvøld- og ungdómsskúlaundirvísingini og fritiðarfyriskipanum í Føroyum. Við støði í hesum áliti hava skiftandi landsstýri lagt fram uppskot til samtyktar í løgtinginum um hetta umráðið sum uppskot til eina kongaliga fyrskipan. Sjálvt um uppskotið í eitt sindur ymsum sniði var lagt fram 3 ferðir, so eydnaðist ikki at fáa meiriluta fyri tí.

Tann tvørrandi undirtøka á tingi bar við sær, at skúlastjórnin seinni mælti landsstýrinum til at seta ein arbeiðsbólk av tænastufólki til tess at gera eitt nýtt uppskot um fritiðarlóggávu.

Á sumri 1975 legði arbeiðsbólkurin úr hendi eitt uppskot um fyriskipan fyri Føroyar um fritiðarundirvísing v.m.

Vegna allan spurning um yvirtøku heimastýrisins av fyrisitingini og í mest møguligan mun at gera reglu um tann part av undirvísingarverkinum, sum hevur verið umsitin av donskum myndugleikum ella Føroya Skúlastjórn, so er spurningurin viðvíkjandi at seta í gildi eina fyriskipan eftir teimum sjónarmiðum, sum nevnd eru í uppskotinum, vorðin lagdur niður. Hesi viðurskifti voldu, at arbeiðsbólkurin ikki kundi avrika arbeiði sítt viðvíkjandi einum uppskoti til løgtingslóg um fritiðarundirvísing v.m., fyrr enn løgtingið í september 1978 hevði viðtikið rammulógina um m.a. fritiðarundirvísing v.m. og løgtingslógina um skúlafyrisiting.

Løgtingslóg nr. 58, dagsett 2/10 1978, um skúlafyrisiting (hereftir nevnd styrislógin) hevur ásett reglur bæði um hægri fyrisiting og fyrisiting á staðnum av fritiðarundirvísing og -virksemi, sbr. 1. kapittul í lógini um skúlafyrisiting (Tann hægra fyrisitingin) og 3. kapittul (Fritiðarundirvísingin).

Harumframt er lóg nr. 53, dagsett 14. februar 1979, fyri Føroyar um fritiðarundirvísing v.m. Henda lóg er rammulóg fyri hetta umráðið, og innan rammurnar í hesi lóg ásetur heimastýrið nærri reglur um fritiðarundirvísing v.m., heruppi í um fyrisitingina av undirvísingini, innihald, vav og hvussu hon skal verða løgd til rættis, sbr. § 9 í rammulógini.

Í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur arbeiðsbólkurin greitt nærri frá uppskotinum til eina endurnýgging av fritiðarundirvísingini v.m., og skal tí verða vist á hesar viðmerkingar, sbr. síðu 11 - 32.

Tó skal viðmerkjast, at hetta lógaruppskotið heimilar formliga at leggja øll slag av fritiðarundirvísing og -virksemi inn undir lóggávuna, meðan tann veruligi

spurningurin um, í hvørjum vavi lógin kann skapa støði fyri studningi v.m., lutvist er treytaður av teimum til cina og hvørja tið verandi játtanum á løgtingsins figgjarlóg, og lutvíst í hvussu stórum vavi tær einstøku kommununrnar ynskja at gera nýtslu av lógini og so endiliga av teimum almennu reglunum um innihaldið í undirvísingini v.m., sum vegna lógaruppskotið verða settar í verk. Sambært rammulógina skal kortini verða tryggjað, at tað verður givið íbúgvunum í kommununi eitt fjølbroytt tilboð um fritiðarundirvísing í einum vavi, sum hóskandi er viðurskiftunum, og at tað verður tryggjað børnum og ungfólki undir 25 ár eitt fjølbroytt tilboð um fritiðarvirksemi í einum vavi, sum hóskandi er viðurskiftunum. So er tað eisini skylda kommunanna at tryggja, at íbúgvararnir fáa tilboð um serstaka fritiðarundirvísing.

Við oman fyri nevndu viðmerkingum skal arbeiðsbólkurin mæla til, at uppskot hansara um eina nýggja fritíðarlóggávu verður at skapa støði undir landsstýrisins uppskoti í hesum máli.

Tórshavn, á summarmála 1979.

A.J. Arnskov | Inger Christiansen | Ludvig Petersen

UPPSKOT
til
løgtingslóg um fritíðarundirvísing v.m.

1. táttur

Hugtak fritíðarundirvísingarinnar

§ 1
Fritíðarundirvísing v.m. er undirvísing og virksemi, sum verða boðin eftir hesi lóg, ið er givin út sambært rammulóg fyri Føroyar um fritíðarundirvísing v.m.

2. táttur

Almenn fritíðaruudirvísing

§ 2
Við almenna fritíðarundirvísing í hesi lóg meinast við undirvísing í teimum evnum, sum íbúgvarnir yvir 14 ár í fritíðini ynskja at fáa undirvísing í.
2. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um almenna fritíðarundirvísing.
3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvísingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis, heruppií avmarkingar í undirvísingarevnunum.
4. stk. Skúlafyrisitingin kann undir serligum umstøðum loyva ungfólki undir 14 ár at luttaka í fritíðarundirvísing eftir hesum tátti.

§ 3
Kommunurnar seta á stovn almenna fritíðarundirvísing. Tær einstøku kommunurnar hava skyldu til at tryggja íbúgvunum í kommununi eitt fjølbroytt tilboð um almenna fritíðarundirvísing í einum vavi, sum hóskandi er til viðurskiftini í kommununi. Hetta kann gerast við sjálvstøðugari stovnseting av fritíðarundirvísing, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til fritíðarundirvísing í øðrum kommunum ella við samarbeiði við aðrar undirvísingarstovnar ella felagsskapir.
2. stk. Tær einstøku kommunurnar hava skyldu til at taka ímóti íbúgvum úr øðrum kommunum til fritíðarundirvísing eftir hesum tátti.
3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur fyri skyldu kommununnar eftir 1. og 2. stk.

§ 4
Almenn fritíðarundirvísing skal lúka hesar treytir:
1) Undirvísingin skal standa øllum í boði.

2) Undirvisingin skal verða løgd til rættis eftir eini ætlan, sum tryggjar, at givin verður ein verulig undirvísing við eini fjølbroyttari lýsing av evninum. Hon kann somuleiðis vera løgd til rættis sum lesiringar, fyrilestrarøðir ella sovorðið.
3) Undirvisingin skal í minsta lagi fevna um 20 tímar í hvørjum evni.
4) Undirvisingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.
5) Lærararnir skulu hava tær neyðugu útbúgvingarnar fyri at kunna undirvisa í viðkomandi evnum.

2. stk. Landsskúlaráðið kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

3. táttur

Serstøk fritíðarundirvísing

§ 5

Kommunurnar hava skyldu til í tí vavi, sum tørvur er á, at seta á stovn serstaka fritíðarundirvísing fyri íbúgvarnar yvir 14 ár, sum fevnir um:

1) Royndarfyrireikandi undirvísing, sum eftir ynski hjá tí einstaka luttakaranum kann enda við gókendari roynd ella prógvtøku.
2) Yrkiskend undirvísing, sum miðar ímóti einum ávisum arbeiðsumráði.
3) Serundirvísing.

2. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um serstaka fritíðarundirvísing.

3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í undirvisingini, og hvussu hon kann verða løgd til rættis.

4. stk. Landsskúlaráðið ásetur, um skylda kommunanna eftir 1. stk. skal lúkast við sjálvstøðugari stovnseting av undirvísing av hesum slagi, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til undirvísing í øðrum kommunum ella til kommunalar ella ikki-kommunalar skúlar v.m.

§ 6

Skeiðini skulu lúka hesar treytir:

1) Undirvisingin skal standa øllum í boði.
2) Undirvisingin skal verða løgd til rættis samsvarandi teimum ætlanum, sum eru ásettar fyri viðkomandi lærugrein ella evni.
3) Undirvisingin skal vera ókeypis.
4) Undirvisingin skal fara fram í egnaðum hølum við neyðugum útbúnaði.
5) Lærararnir skulu hava tær neyðugu útbúgvingarnar fyri at geva avvarðandi undirvísing.

2. stk. Landsskúlaráðið kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk.

§ 7

Læratar við aðrar undirvisingarstovnar v.m. kunnu eftir nærri meginreglum, sum landsskúlaráðið ásetur, taka á seg ta í hesum tátti nevndu fritíðarundirvising við samsvarandi niðurskurði í tí skylduga undirvisingartímatalinum við viðkomandi stovn.

§ 8

Teir næmingar, sum fáa undirvising í samsvarandi lærugrein í fólkaskúlanum ella á øðrum undirvisingarstovnum, kunnu bert luttaka í serstakari fritíðarundirvising eftir hesum tátti við loyvi frá landsskúlaráðnum.

4. táttur

Fritíðarvirksemi

§ 9

Í hvørji kommunu verður við kommunalum ella privatum fyritakssemi sett á stovn fritíðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár samsvarandi reglunum í hesum tátti.
2. stk. Býar-/bygdarráðið skal ansa eftir, at tað verður tryggjað børnum og ungfólki undir 25 ár eitt fjølbroytt tilboð um fritíðarvirksemi í einum vavi, sum høskandi er til viðurskiftini í kommununi.
3. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um fritíðarvirksemi.
4. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um innihaldið í tilboðnum.
5. stk. Kommunan skal eftir nærri reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent, veita studning til fritíðarvirksemi eftir 1. stk.

§ 10

Ein kommuna kann góðkenna, at fólk yvir 25 ár luttaka í fritíðarvirksemi av tí slagi, sum umrøtt er í § 9.
2. stk. Ein kommuna kann somuleiðis góðkenna, at fritíðarvirksemi bert verður skipað fyri fólk yvir 25 ár.
3. stk. Landsstýrið kann áseta almennar reglur um fritíðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.
4. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna reglur um innihaldið í fritíðarvirkseminum eftir 1. og 2. stk.
5. stk. Landsskúlaráðið góðkennir reglur um, hvussu og í hvørjum vavi kommunurnar kunnu veita studning til fritíðarvirksemi eftir 1. og 2. stk.

§ 11

Fritíðarvirksemið skal lúka hesar treytir:

1) Fritiðarvirksemið skal vera lagt til rættis fyri øll og standa øllum í boði eftir almennum eyðkennum.
2) Fritiðarvirksemið skal fara fram í egnaðum hølum ella á uttandura plássum við neyðugum útbúnaði.

2. stk. Landsskúlaráðið kann í serstøkum førum loyva frávik frá reglunum í 1. stk., eins og tað kann áseta avmarkingar í talinum á tí virksemisslagi, sum tann einstaki við studningsvirkan kann luttaka í.

5. táttur

Høli v.m.

§ 12

Bý/bygdarráðið skal eftir reglum, sum landsskúlaráðið góðkennir, útvega egnað høli ella uttandura pláss við neyðugum útbúnaði til fritiðarundirvising og fritiðarvirksemi fyri íbúgvarnar.

2. stk. Skúlar, onnur egnað høli og uttandura pláss, sum tað almenna eigur, skulu vera til taks ókeypis við ljósi, varma, reingerð, neyðugari umsjón og verandi útbúnaði v.m. í tí vavi, ið er sambæriligt við nýtslu teirra annars.

3. stk. Aðrir skúlar, høli og uttandura pláss, sum landsskúlaráðið til rakstur ella bygging hevur goldið lán ella studning, skulu við neyðugum útbúnaði og í tí vavi, sum er sambæriligt við nýtslu teirra annars, vera til taks eftir reglum, sum landsskúlaráðið góðkennir. Sama er galdandi, um so er, at lán ella studningur eru veitt til byggingina úr landskassanum og/ella ríkiskassanum.

6. táttur

Fyrisitingarligar reglur

§ 13

Bý/bygdarráðið skal syrgja fyri, at kommununnar íbúgvum standa fritiðarundirvising og -virksemi í boði eftir hesi lóg.

2. stk. Bý/bygdarráðið skal áseta á ta árligu fíggjarætlanina rammurnar fyri fritiðarundirvising eftir 2. tátti og fritiðarvirksemi eftir 4. tátti og hava tey neyðugu fíggjarevni tøk til endamálið.

3. stk. Landsskúlaráðið kann áseta eitt minsta mark fyri vavið á skyldunum hjá tí einstøku kommunu eftir 2. og 4. tátti.

4. stk. Fyriskipanin í § 36 í stýrislógini er somuleiðis galdandi, tá ið talan er um virksemi eftir hesi lóg.

§ 14

Skúlanevndin skal eftir nærri reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent, senda á hvørjum ári uppskot til bý/bygdarráðið um eina ætlan um tilboð um fritíðarundirvísing og fritíðarvirksemi eftir 2. - 4. tátti í hesi lóg. Leiðarin av fritíðarundirvísingini v.m. í kommununi ger uppskotið.

2. stk. Tann ætlan, sum skúlanevndin sendir bý/bygdarráðnum sbr. 1. stk., skal, um so er, at hon ikki fer út um tær rammur, sum eru ásettar á figgjarætlanini fyri fritíðarundirvísing ella -virksemi eftir ávikavist 2. og 4. tátti, bý/bygdarráðið senda viðari til landsskúlaráðið til endaliga góðkenning. Um so er, at ætlanin fer út um tær ásettu rammur fyri fritíðarundirvísing v.m. eftir 2. ella 4. tátti ella báðar tættir, skal ætlanin, áðrenn hon verður send viðari til landsskúlaráðið til endaliga góðkenning, viðgerast í bý/bygdarráðnum, sum tekur avgerð um møguligar broytingar í ætlanini, í tann mun hon fer út um tær rammur, sum ásettar eru á figgjarætlanini.

3. stk. Bý/bygdarráðið skal fyriskipa, at tann árliga ætlanin um kommununnar tilboð um fritíðarundirvísing og -virksemi verður send landsskúlaráðnum innan 1. juli.

§ 15

Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent, leiða ta fritíðarundirvísing v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglunum í hesi lóg.

2. stk. Um so er, at ein kommuna hevur fleiri skúlaleiðarar, men ongan leiðandi skúlastjóra, so tilnevnir kommunan ein av skúlaleiðarunum at taka sær av tí í 1. stk. nevndu uppgávu. Landsskúlaráðið skal góðkenna hesa tilnevning.

3. stk. Eftir tilmæli frá tí í 1. stk. nevnda leiðara kann eitt bý/bygdarráð, eftir at tað hevur fingið ummæli frá skúlanevndini, seta leiðaranum eitt hjálparfólk, sum undir eftirliti leiðarans tekur sær av teimum uppgávum, sum eru lagdar á hann eftir 1. stk.

4. stk. Landsskúlaráðið góðkennir tær nærri reglurnar fyri tí virksemi v.m., sum tað í 3. stk. nevnda hjálparfólk kann útinna og fyri eftirlitinum við tí.

§ 16

Bý/bygdarráðið og skúlanevndin hava skyldu til at tryggja, at ásetanirnar í hesi lóg verða framdar.

2. stk. Tær skyldur, sum bý/bygdarráðið og skúlanevndin hava eftir hesi lóg, kunnu eftir góðkenning landsskúlaráðsins heilt ella lutvist latast einum felagsskúlastýri og avvarðandi felagsskúlanevnd ella øðrum kommunalum felagsskapi upp í hendi.

§ 17

Landsskúlaráðið góðkennir setanarkorini, heruppií somuleiðis lønina hjá leiðarum, hjálparfólki eftir § 15, 3. stk. og lærarum við fritíðarundirvisingina v.m.

2. stk. Landsskúlaráðið skal tryggja neyðuga samskipan millum fritíðarundirvisingina v.m. í teimum einstøku kommununum eftir hesi lóg og millum hesa undirvísing v.m. og undirvísingina í øðrum undirvísingarstovnum, heruppií serliga fólkaskúlanum. Landsskúlaráðið kann í hesum sambandi geva kommunum boð um neyðugar fyriskipanir til at tryggja hetta.
3. stk. Landsskúlaráðið kann seta í verk landsumfatandi fritíðarundirvising v.m.
4. stk. Landsskúlaráðið ger eina ætlan fyri útbyggingina av fritíðarundirvisingini v.m. eftir hesi lóg.

7. lattur

Studningsreglur v.m.

§ 18

Kommunan rindar allar útreiðslur til góðkenda fritíðarundirvising v.m. eftir 2. - 4. tátti í hesi lóg, um so er, at ikki annað er ásett í lóg ella reglum, sum landsskúlaráðið hevur góðkent.
2. stk. Landsskúlaráðið ásetur, í hvønn mun tær goldnu útreiðslurnar kunnu vera góðkendar sum studningsheimilaðar, eins og tað ásetur, hvussu útreiðslurnar skulu býtast millum tvær ella fleiri kommunur, um so er, at kommununnar íbúgvar luttaka í fritíðarundirvising v.m., fyriskipað og góðkend av øðrum kommunum ella stovnum.
3. stk. Landsskúlaráðið kann góðkenna almennar reglur um tey í 2. stk. nevndu viðurskifti.

§ 19

Luttakarar í almennari fritíðarundirvising eftir 2. tátti skulu rinda eitt gjald, sum landsskúlaráðið góðkennir.
2. stk. Luttøka í serstakari fritíðarundirvising eftir 3. tátti er ókeypis.
3. stk. Luttakarar í fritíðarvirksemi eftir 4. tátti skulu sjálvir rinda ein part, sum landsskúlaráðið hevur góðkent.

§ 20

Landskassin rindar kommununum 50% í studningi av teimum studningsheimilaðu útreiðslum til góðkenda almenna fritíðarundirvising eftir 2. tátti og til góðkenn fritíðarvirksemi eftir 4. tátti. Studningurin til serstaka fritíðarundirvísing eftir 3. tátti er 100% av teimum studningsheimilaðu útreiðslunum.

Landsskúlaráðið kann góðkenna nærri reglur um gjaldið av útreiðslunum eftir hesi lóg.

§ 21

Bý/bygdarráðið skal árliga innan 1. juli senda landsskútaráðnum ein av grann-

skoðara kommununnar áteknaðan roknskap fyri góðkent virksemi.
2. stk. Við støði í tí grannskoðaða roknskapinum ger skúlafyrisitingin eitt endaligt býti av útreiðslunum millum kommununa og landskassan.
3. stk. Skúlafyrisitingin kann áseta nærri reglur um tilevningina v.m. av roknskapinum.

8. táttur

Aðrar ásetingar

§ 22

Landsskúlaráðið kann veita leiðarum og lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum við atliti til frítíðarundirvising v.m. allan ella lutvísan stuðul. Tað kann táa í lag, at skeið verða hildin.

§ 23

Settur verður á stovn ein grunnur, sum kann veita studning og/ella lán til tess at fremja frítíðarundirvising v.m. eftir hesi lóg.
2. stk. Grunninum verður árliga veitt ein peningaupphædd, ið svarar til 5% av øllum studningsheimilaðum útreiðslum til góðkenda frítíðarundirvising v.m. eftir 2. - 4. tátti í hesi lóg. Av tí veittu upphæddini rinda kommunurnar 50% og landskassin 50%. Kommunanna partur verður deildur við helvtini eftir íbúgvaratali og helvtini eftir skattainntøkuni.
3. stk. Í grunnin koma somuleiðis rentur og avdráttir av teimum lánum, sum grunnurin hevur veitt, eins og tær serstøku árligu játtanir, ið ásettar eru á líggjarlógini.
4. stk. Landsstýrið ásetur viðtøkurnar fyri grunnin, sum verður stýrdur av landskúlaráðnum.

9. táttur

Ásetanir um, nær lógin fær gildi v.m.

§ 24

Henda lóg fær gildi 1. august 1979.
2. stk. Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um rikisstudning til ungdóms- og kvøldskúlar í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935, fer úr gildi.

Viðmerkingar til lógaruppskotið

Vanligar viðmerkingar

1 Inngangur

Tær galdandi reglur um kvøldskúlar standa í kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 hjá kenslumálaráðnum og nr. 276 frá 7. oktober 1935 um studning frá stati til ungdoms- og kvøldskúlar í Føroyum. Frá 1949 eru lønirnar vornar dagførdar í samsvar við læraralønir fólkaskúlans.

Eftir reglunum í omanfyri nevndu kunngerð er lærugreinarøðin avmarkað til ein tal av beinleiðis nevndum lærugreinum, og tað er ikki atgongd at taka góðkendar royndir.

Í ásannanini av, at tað fyriliggjandi uppskot til reglur um fritíðarundirvising v.m. ikki kann hava verið framt, fyrr enn spurningurin um framtíðarinnar bygnað og umsiting av skúlaverkinum allur er loystur, hevur skúlastjórnin tey seinastu árini tulkað tær galdandi reglur ógvuliga viðfevnandi, tá ið talan er um lærugreinarøðina. Undirvising, sum hevur miðað ímóti góðkendum royndum, er eisini vorðin góðkend, hóast næmingurin kortini hevur tikið royndina sum privatistur á einum undirvisingarstovni, sum hevur prógvtøkuheimild. Sum dømi um slíkar royndir eru at nevna royndir í maskinskriving, bókhaldi, týskum (vegna HF) og í siglingarfrøði.

Skúlastjórnin hevur tó ikki hildið seg kunnað tulkað stuðul til fritíðarvirksemi hjá ungfólki í teimum galdandi reglunum.

Í 1960/61 var talið á næmingum í kvøldskúlanum 1.164 við einum samlaðum tímatali upp í 6.773. Hetta talið hevði verið tvífaldað, um so var, at kvøldskúlin hevði fylgt ti mynstri, sum tann danski kvøldskúlin hevði um hetta mundið. Í teimum fylgjandi árum hækkaði talið, og í 1970/71 var næmingatalið hækkað til 2.355 við ialt 14.744 tímum.

Í 1977/78 var næmingatalið 4.907 við ialt 26.207,5 tímum. Meðan tað fyrr hava verið o.u. 90% kvinnur og 10% menn, so er býtið nú broytt soleiðis, at tað í seinnu árum eru 78% kvinnur og 22% menn. Fyrr vóru tað serstakliga handverkslærugreinirnar, ið helst á bygdunum gjørdu seg galdandi, men í seinnu árum hevur býtið millum lærugreinirnar verið eitt sindur javnari. Tær veruligu bóklígu lærugreinir, heruppi í maskinskriving og bókhald, fevna um 11 - 12% av tímatalinum, siglingarfrøði 2 - 3%, tónleikur og sangur 9%, fimleikur og svimjing 5%, meðan restin, 71%, eru tær ítrivkendu lærugreinirnar sum handarbeiði, heimkunnleiki, smið o.s.fr. Henda útbreiðsla heldur fram, og tað er at vænta, at tær meira bóklíga kendu lærugreinirnar fara at fevna um ein størri part av tímatalinum í komandi árum.

Tað skal viðmerkjast, at Fróðskaparsetur Føroya hevur havt kvøldskúlaundirvising í máli í Tórshavn nú í mong ár. Í 1977-78 fingu 254 næmingar undirvising í tilsaman 720 tímar. Fróðskaparsetrið hevur somuleiðis havt fyrilestraroðir nú um árini við stórum áhoyraratali.

Í 1977/78 vóru 26% av luttakarunum undir 18 ár, 19% millum 18 - 25 ár og 55% yvir 25 ár. Sum áður nevnt vóru 78% av luttakarunum kvinnur sundurbýttar í triggjar aldursbólkar við ávikavist 16,15 og 47% av tí samlaða luttakaratalinum. Menninir vóru 22% og býttir sundur í teir tveir aldursbólkarnar við ávikavist 10,4 og 8% av tí samlaða luttakaratalinum.

II Innihaldið í lógaruppskotinum

Uppgávan hjá arbeiðsbólkinum var upprunaliga við støði í tí donsku fritíðarlógini at gera eitt uppskot til eina fyriskipan fyri Føroyar. Aftan á løgtingssamtykt um rammulóggávuna um m.a. fritíðarundirvising v.m. og hennara samtykt í Fólkatinginum er ikki longur neyðugt at fylgja tí donsku lóggávuni á umráðnum, men tó eiga vit at líkja tágnarkið av teimum fyriskipanum, sum ásettar eru í rammulóggávuni.

Viðurskiftini her á landi bera við sær, at tað vegna eitt so lítið íbúgvaragrundarlag mangastaðni má fáast í lag eitt samarbeiði millum kommunurnar, soleiðis at íbúgvarnir í ein hóskandi mun kunnu fáa møguleikar at fáa ta fritíðarundirvising og -virksemi, sum teir ynskja.

Hesi somu viðurskifti gera, at tað ikki ber til í sama mun sum í einum størri landi at hava ymisk sløg av fritíðarundirvising og -virksemi samstundis. Úrsliið hevði verið, at einki av teimum ymsu sløgunum hevði kunnað fingið so frægt av luttakarum, at tað hevði verið góðkent. Men tað er ikki bert innan fritíðarundirvising v.m., at hesi viðurskifti eru av týdningi. Ofta eru so fáir luttakarar til eina ávisa hæreingrein í fólkaskúlanum og í øðrum undirvisingarstovnum, at tað ikki eru líkindi at seta undirvisingina í verk. Men samarbeiða teir ymsu stovnarnir, verður ofta luttakaratalið samanlagt so mikið stórt, at undirvisingin kann setast í verk. Eitt tílíkt samarbeiði hevur verið sera torført at fingið til vega undir tí higartil verandi stýrislagi av undirvisingarverkinum, men við tí hægru stýring í tí nýggju stýrislógini skuldi tað verið møguligt. Viðmerkjast skal, at fólkaskúlalógin m.a. í § 3, 4. stk. ásetur, at landsskúlaráðið kann loyva, at næmingar fólkaskúlans heilt ella lutvist fáa sína undirvising á øðrum undirvisingarstovnum enn fólkaskúlanum. Som tað skilst av viðmerkingunum til hesa reglu, so verður serstakliga hugsað um fritíðarundirvisingina.

a. Almenn fritíðarundirvising

Hesin undirvisingarformur er at skilja sum undirvising í teimum evnum, sum íbúgvarnir yvir 14 ár í fritíðini ynskja at fáa undirvising í. Hetta samsvarar við tað fyrrverandi kvøldskúlaundirvising, sum hóast navnið eisini kann hava farið fram um dagin.

Vavið á undirvisingini og luttakaratalið er fyrst og fremst av fíggjarligum týdningi, og tí eigur landsstýrið at áseta almennar reglur hesum viðvíkjandi. Har-

afturímóti er innihaldið í undirvisingini, og hvussu hon eigur at verða løgd til rættis, og møguligar avmarkingar í lærugreinarøðini fyrst og fremst av pedagogiskum slagi, og ti eigur landsskúlaráðið at áseta almennar reglur um hesi viðurskifti.

Havandi í huga, at undirvisingarskyldan í fólkaskúlanum endar aftan á 7 ára skúlagongd, t.v.s. í 14-15 ára aldrinum, so heldur arbeiðsbólkurin tað vera rímiligt at seta minstamarkið fyri at kunna luttaka í kvøldskúlaundirvísing til 14 ár. Í serligum førum kann skúlafyrisitingin tó loyva ungdómum undir 14 ár at luttaka.

Tað er tann einstaka kommunan, ið sbr. § 3, 1. stk. í lógini skal seta ta almennu fritíðarundirvisingina á stovn, og tað er hon, ið hevur skyldu til at tryggja íbúgvunum í kommununi eitt fjølbroytt undirvisingartilboð, ið sammett við viðurskiftini í kommununi, skal vera í einum rímiligum vavi.

Av teimum oman fyri nevndu viðurskiftum viðvíkjandi íbúgvaragrundarlagnum má haldast at vera heilt neyðugt, at leiðarin av skúlaverkinum í kommununi annaðhvørt sjálvur hevur alla kvøldskúlaundirvisingina um hendur, ella at hon undir umsjón hansara verður løgd yvir á tann setta leiðaran fyri fritíðarundirvisingini v.m. Hetta merkir ikki, at ein bólkur ella eitt felag eru vorðin útihýst at hava fritíðarundirvísing bert fyri limirnar í bólkinum ella felagnum. Hetta eigur bert at verða gjørt gjøgnum tann kommunala kvøldskúlan og við góðkenning frá landsskúlaráðnum.

Higartil hevur tann einstaki lærarin á staðnum í flestu førum tikið stig til at byrja kvøldskúlan, og tað hevur sjáldan í størri mun verið nøkur kapping um luttakarar. Í seinni árum havu nakrar av teimum størru kommunum havt ein leiðara til kvøldskúlaundirvisingina. Hetta hevur havt stóra ávirkan á vavið á kvøldskúlanum í avvarðandi kommunum.

b. Serstøk fritíðarundirvísing

Hesin undirvísingarformur fevnir um royndarfyrireikandi undirvising, yrkiskenda undirvising og serundirvising.

Í øllum trimum førum er hóskandi at hava eitt neyvt samarbeiði við aðrar undirvisingarstovnar.

Stovnsetingin av slíkari undirvising kann bera við sær, at íbúgvarnir í teimum pørtum av landinum, har eingir undirvisingarstovnar eru, sum kunnu bjóða undirvising av hesum slagi, ella at tað ikki á stovnunum eru nóg nógvir næmingar til hesa undirvísing, koma at fáa betri møguleikar at kunna fáa undirvísing av hesum slagi uttan at verða noyddir at koyra ella flyta í aðra kommunu.

Tað eru kommunurnar, sum hava skyldu til at stovnseta undirvising av hesum slagi, men til tess at tryggja eitt hóskandi luttakaratal og fyri at sleppa undan óneyðugum spelli, er tað landsskúlaráðið, ið ásetur, hvussu og hvar undirvising av hesum slagi kann fara fram.

c. Fritiðarvirksemi

Hetta er eitt nýtt umráði innan fritiðarundirvisingina v.m. her á landi.

Skúlastjórnin hevur í seinnu árum í einum avisum vavi góðkent, at fólkaskúlin kann geva næmingunum undirvising í fritiðini serstakliga í teimum musisku lærugreinunum.

Kommunurnar og landsstýrið hava í ein ávisan mun styðjað fritiðarvirksemið. Í hesum viðfangi kann nevnast stuðul til ítróttaendamál og til tónleik (tónleikaskúlar og hornorkestur) og sangkór.

Tað er fyrst og fremst ein lutvist ónýttur, men stórur tørvur á at tryggja ungdóminum møguleikar fyri einum rimiligum og fjølbroyttum slagi av fritiðarvirksemi.

Umframt teir longu nevndu møguleikarnar kann somuleiðis verða vist á onnur sløg av undirvisingarvirksemi sum t.d. skótarørslur, talvfeløg, frimerkjafeløg v.m.

Ungdómurin hevur fyri neyðini at fáa atgongd til ítrivsverkstaðir og felags- og samveruvirksemi av ymsum slag. Tey veruligu ungdómsfeløgini hava higartil fingið sera lítlan stuðul frá ti almenna.

Tað oman fyri nevnda fritiðarvirksemið er bæði ætlað børnum og ungdómum undir 25 ár sum ti parti av fólkinum, ið er oman fyri 25 ár.

Tað eru tey sløg av fritiðarvirksemi, sum nevnd eru, ið best munnu vera høskandi ungdómi undir 25 ár, meðan tað eru onnur, ið best munnu høska teimum, sum eru eldri enn 25 ár. So eru tað eisini fritiðarvirksemi, sum bæði eru høskandi fyri tey, sum eru yngri og eldri enn 25 ár.

Hóast skylda kommunanna viðvikjandi fritíðarvirksemi fyrst og fremst er galdandi teirra vegna, sum eru yngri enn 25 ár, so eigur fritiðarvirksemið ikki at verða avmarkað til henda aldursbólkin. Hin vegin kann tættliga bera á, at viðkomandi fritíðarvirksemi ikki kann gerast veruleiki vegna ov lítla undirtøku.

d. Høli v.m.

Sambært lógaruppskotið hava kommunurnar skyldu til at útvega høskandi høli og uttandura plass til tað í lógini nevnda virksemið.

Tað almenna, t.v.s. landið, staturin og kommunurnar skulu ókeypis hava høskandi høli tøk í tí vavi, sum er sambæriligt við nýtslu teirra annars.

Av reglunum skilst, at tað er landsskúlaráðið, ið ásetur tær neyðugu reglur fyri, hvørji høli eru egnað, nýtslu teirra og fyri møguligari leigu, í tann mun tað almenna ikki eigur hesi høli.

e. Umsitingarligar reglur

Í samsvar við stýrislógina er tað fyrst og fremst skúlanevndin, ið hevur ábyrgdina av innihaldinum í fritiðarundirvisingini v.m. eftir hesi lóg.

Bygdarráðið hevur ta fíggjarligu ábyrgdina og skylduna at tryggja, at ein høskandi ætlan verður gjørd fyri fritiðarundirvisingina v.m. eftir hesi lóg.

Tað er sera týdningarmikið, at tað í lógini verður greidliga sagt, at tað er leiðarin av kommununnar skúlaverki (skúlastjórin, møguliga leiðandi skúlastjóri, fyrstilærari ella einalærari), sum eisini er leiðari av fritiðarundirvisingini v.m. í kommununi.

Orsøkin til hesa lógaráseting er hugsanin um tað sera neyva samarbeiðið, sum neyðugt verður at hava millum teir ymsu undirvisingarstovnarnar. Hetta er fyrst og fremst galdandi millum fólkaskúlan og fritiðarundirvisingina v.m. Tað eru hesir báðir skúlaformar, har skúlanevndin er umsjónarmyndugleiki á staðnum.

Av tí at tað er fólkaskúlin, sum í flestu førum skal hava bæði høli og útbúnað til fritiðarundirvisingina tíl taks, so má tað haldast at vera náttúrligt, at tað er leiðarin av kommununnar skúlaverki, ið somuleiðis er leiðari av fritiðarundirvisingini v.m. Tað verkliga arbeiðið kann tó verða litið øðrum upp í hendi, men tað er leiðarin av fólkaskúlanum, sum eigur at hava ábyrgdina av, at skúlaformarnir ikki fara at umskarast, og at allir teir møguleikar, sum miða ímóti at fáa fram eina undirvising við luttakarum úr ymsum skúlaformum, verða troyttir.

Í teimum kommunum, sum hava fleiri skúlaleiðarar, eigur bý/bygdarráðið at útnevna ein av hesum til leiðara av fritiðarundirvisingini v.m.

Um so er, at tað undir skúlaleiðaranum er kosin serstakur leiðari av fritiðarundirvisingini v.m., so eigur hesin leiðari at luttaka á fundum í skúlanevndini, sbr § 9 í stýrislógini.

Arbeiðisbólkurin hevur ta áskoðan, at tær einstøku kommunur fata av umhugsni til íbúgvarnar at royna at seta reglurnar eftir hesi lóg í verk í ein høskandi mun. Men tó varð hildið vera rætt at áseta, at landsskúlaráðið kann áseta minstukrøv til fritiðarundirvising v.m. eftir 2. og 4. tátti. Landsskúlaraðið kann somuleiðis seta eitt mestamark fyri støddini á ti samlaða studninginum til tær einstøku kommunurnar. Ynskir ein kommuna at seta eina størri fritiðarundirvising v.m. í verk enn hana, ið samsvarar við tað ásetta studningsmarkið, so kann tað verða gjørt fyri kommununnar egnu rokning, men hóast hetta, so krevst góðkenning frá landsskúlaráðnum, ið eisini, um so verður, kann nokta fyri, at slík økr undirvisingarlig tiltøk verða sett í verk.

f. Studningur

Í hesum táttinum standa reglurnar um tey fíggjarligu viðurskiftini.

Í roynd og veru er tað kommunan, sum ber allar útreiðslurnar, og sum eisini fær inntøkurnar gjøgnum samsýning frá luttakarunum.

Eftir teimum reglum, sum higartil hava verið galdandi, fáa kommunurnar 70% í studningi av teimum læraralønum, sum skúlastjórnin hevur ásett fyri kvøldskúlaundirvising. Aftur at hesum fáa kommunurnar 2/3 av teimum neyðugu ferðaútreiðslunum, sum tó í mesta lagi er sett til 50% av læraralønini hjá ti avvarðandi

lærara um dagin. Viðvikjandi býtinum av studningsmuni til kommununa millum landskassan og rikiskassan verður vist til III. part í viðmerkingunum. Higartil hevur eingin studningur verið veittur til fritíðarvirksemi.

Í tógaruppskotinum er roknað við einum lægri studningsprosenti enn higartil, men har afturímoti fevna tær studningsheimilaðu útreiðslurnar eisini um aðrar rimiligar útreiðslur enn tær, sum higartil hava verið studningsheimilaðar. Hesi seinast nevndu viðurskifti fara væntandi at stimbra fritíðarundirvisingina serstakliga í teimum smærru kommununum.

Arbeiðisbólkurin hevur tá áskoðan, at tað er gagnligt at lata tey, sum nýttaka í almennari fritíðarundirvising, gjalda eina hóskandi samsýning fyri hesa undirvising. Higartil hava luttakarar vanliga goldið einar 50 kr. í innskrivingargjaldi. Hetta svarar í mesta lagi til 2,50 kr. um tímanin við einum undirvisingartima um vikuna. Hin vegin eigur luttakarunum at verða veitt trygd fyri, at undirvisingin ikki steðgar vegna fráfall. Hetta hendir, sum kunnugt, eftir teimum núgaldandi reglum.

Arbeiðisbólkurin hevði upprunaliga tá áskoðan, at ungmenni undir 18 ár skuldu ikki gjalda fyri almennu fritíðarundirvisingina, sum umrødd er í 2. tátti. Men seinni er bólkurin komin til tað úrslit, at tað er rimiligt, at eisini hesi ungmenni lata eina samsýning. Tó kann verða tikið til umhugsanar, hvørt skúlanæmingar og onnur, ið eru undir útbúgving, eiga at gjalda minni enn aðrir luttakarar. Hetta sama kundi verið galdandi, tá talan er um tey eftirløntu.

Tað slagið av undirvising, ið umrødd er í 3. tátti, serstøk fritíðarundirvising, fer vanliga fram á undirvisingarstovnum, har undirvisingin verður latin næmingunum ókeypis. Luttakararnir skulu sostatt ikki gjalda samsýning fyri hesi sløg av undirvising.

Sum áður nevnt hevur eingin studningur verið latin eftir tí kvøldskúlalóggávu, vit higartil hava, til tað fritíðarvirksemi, sum umrøtt er í 4. tátti. Í tann mun, sum studningur yvirhøvur er latin, er tað gjørt gjøgnum játtanir á fíggjarætlanini og veitt eftir nærri reglum, sum landsstýrið hevur ásett í hvørjum einstøkum føri.

Arbeiðisbólkurin hevur ikki hildið tað verið ynskjandi at gera reglur um, hvussu studningur eigur at verða veittur, áðrenn nøkur politisk avgerð er tikin í hesum máli.

Tó hevur arbeiðisbólkurin hildið seg kunnað skotið upp,

at fíggjarætlan eigur at verða fingin til vega fyri tey avvarðandi virksemi,

at tað við støði í teimum innsendu fíggjarætlanunum fyri hvørt einstakt slag av virksemi verður gjørd ein meginfíggjarætlan, sum møguliga verður sundurgreind eftir luttakaratalinum,

at kravd verður ein hóskandi fíggjarlig sjálvsiløga hjá tí einstaka luttakaranum, ið verður latin sum limagjald, sjálvboðið arbeiði v.m.

at eingin studningur verður latin, um so er, at tann fíggjarligi tørvurin hjá viðkomandi virksemi ikki er størri enn tann iløga, sum luttakararnir hóskandi kunnu metast at gjalda sjálvir.

Viðvikjandi teimum veruligu ungdómsfeløgunum er at viðmerkja, at tað neyvan kann gerast nøkur meginfíggjarætlan fyri hesi. Tað einstaka felagið eigur at gera

eina figgjarætlan, sum kommunan og landsskúlaráðið skulu góðkenna. Felagið eigur sjálvt at útvega 20% av hesi figgjarætlan, meðan kommunan letur tey 80%.

Arbeiðisbólkurin hevur skotið upp, at kommununi verða veitt 50% í studningi av teimum góðkendu útreiðslunum til almenna fritiðarundirvising og til fritiðarvirksemi. Av tí at studningur er ramn sami fyri tey ymsu sløgini av virksemi, hevur tað minni at týða hjá kommunum, hvørt tað einstaka virksemið kemur undir 2. tátt — almenn fritiðarundirvising — ella 4. tátt — fritiðarvirksemi. Harafturímóti hevur tað týdning fyri luttakaraunar og tær útreiðslur, sum teimum lutast við at luttaka. Tað kann vera torført at skilja imillum tey bæði sløgini av virksemi.

Viðvíkjandi tí serstøku fritiðarundirvisingini verður mælt til, at kommununrnar fáa allar tær góðkendu útreiðslurnar endurgoldnar úr landskassanum. Hetta verður skotið upp við tí í huga, at lands- ella ríkisstovnarnir í løtuni gjalda hesa umrøddu undirvising. Tað er tí høskandi, at kommununrnar fáa fult endurgjald, t.v.s. 100%.

Tað má ásannast, at tað verður somuleiðis torført at skilja imillum undirvising, sum kemur inn undir 2. tátt og ta undirvising, sum eigur at koma inn undir 3. tátt. Arbetðisbólkurin hevur tó ta áskoðan, at tað verður gjørligt at gera ávís almenn stevnumið fyri, hvat ið eigur at koma inn undir 2. tátt, og hvar ið eigur at koma inn undir 3. tátt. I einstøkum førum er hugsandi, at virksemið kemur bæði inn undir 2. og 3. tátt, treytað av tí einstaka luttakaranum.

g. Aðrar reglur

Í hesum tátti standa í § 22 fyriskipanirnar um, eftir hvørjum landsskúlaráðið kann veita teimum lærarum, sum luttaka í útbúgvingarskeiðum, studul, eins og ráðið sjálvt kann skipa fyri skeiðum.

Samsvarandi § 23 verður settur á stovn ein grunnur, sum kann veita studning ella lán til tess at fremja fritiðarundirvising v.m. Arbeiðisbólkurin vil leggja dent á tann týdning, ein slíkur grunnur hevur. Landsstýrið skal áseta nærri reglur fyri grunsins virki. Skúlafyrisitingin skal undir ábyrgd landsskúlaráðsins stjórna grunninum.

Fæ grunsins er ætlað at nýta til landsumfatandi tiltøk til tess at fremja fritiðarundirvisingina v.m. Hetta kann t.d. fevna um undirvising gjøgnum útvarp og sjónvarp, bæði av almennum og meira royndarkendum slagi eins og ta bretska »open university« (opið universitet), sum gjøgnum útvarp og sjónvarp undirvísir á universitets stigi.

Fæ grunsins eigur eisini at kunna nýtast til tess at styðja kommunur, sum eru sera vánaligar fyri v.m. ella til tess at fremja fritiðarundirvising v.m. í stórri umráðum sum t.d. eini sýslu.

Grunnurin eigur somuleiðis at kunna veita lán ella studning til bygningar, uttandura pláss v.m., amboð, innbúgv o.a., sum brúkt verður í sambandi við fritiðarundirvising v.m. í tann mun, sum ikki studningur kann verða veittur til á annan hátt. Tað eru framvegis møguleikar fyri studli til íróttahallir, svimjihallir og íróttaendamál við 30% úr landskassanum og 20% úr ríkiskassanum — higartil

veitt gjøgnum skúlastjórnina. Til ungdómshús verður framvegis at veita studningar við 40% eftir heimild í løgtingslóg nr. 50, dagfest 24. mai 1974, um studning til bygging av ungdómshúsum.

h. Annað

Arbeiðisbólkurin hevur umhugsað, hvørt reglur eiga at verða ásettar um eina ráðgevandi nevnd, sum skal vera landsskúlaráðnum og skúlafyrisitingini til hjálpar.

Arbeiðisbólkurin er samdur um, at ein tílík ráðgevandi nevnd ikki eigur at vera lógfest í fritíðarundirvísingarlógini, men heldur tað vera hóskandi, at landsskúlastjórin í ein neyðugan og hóskandi mun setur eina slíka nevnd. Sambært § 6 í stýrislógini hevur hann heimild til tess.

Í hesum viðfangi kann nevnast, at tann týdningarmesta nevndin innan fólkaskúlan, lesiætlanarnevndin, sum ger uppskot til lesiætlanir fólkaskúlans, er ikki lógfest, men sett av skúlastjórnini sum eitt hóskandi og neyðugt tiltak.

III Tær fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum

a. Almenn fritíðarundirvísing eftir 2. tátti

Eftir lógaruppskotinum hava øll yvir 14 ár rætt at luttaka í undirvísing av hesum slagi. Eftir aldursbýtinum íbúgvanna millum hava 30.000 rætt at luttaka í hesi undirvísing.

Í 1977/78 luttóku 4.900 fólk í kvøldskúlaundirvísing. Summi luttóku í fleiri skeiðum. Sostatt luttóku ein slakur 1/6 av teimum, sum høvdu rætt at luttaka.

Luttakaratalið fer helst at vaksa við hesum nýggju reglunum, bæði tí at kommunurnar fáa skyldu til at bjóða undirvísing, og tí at fóggávan ber við sær, at landsmyndugleikin skal virkin royna at fáa fritíðarundirvísingina framda.

Harafturímóti verður eftir galdandi kvøldskúlareglum undirvísing góðkend, sum eftir teimum nýggju reglum helst kemur undir 3. tátt, serstøk fritíðarundirvísing, ella 4. tátt, fritíðarvirksemi, samanber fyrr siðurnar 2 og 3. Hetta vil bera við sær, at luttakaratalið innan ta almennu fritíðarundirvísingina fer at hekka nakað.

Harafttrat fara vanligar sjónvarpssendingar at byrja um stutta tíð. Tað má haldast, at hetta eisini fer at ávirka luttakaratalið niðureftir.

Havandi hesi viðurskifti í huga, metir arbeiðisbólkurin, at tað í samband við uppsetingina av teimum fíggjarligu avleiðingum av lógaruppskotinum má roknast við 5.000 luttakarum árliga. Við eini rimiligari bólkstødd og eini vanligari undirvísingartíð í tíðarskeiðinum 1. oktober - 31. mars svarar hetta til um leið 25.000 læraratímar um árið.

Við tí núverandi læraraløn í kvøldskúlanum upp á 86,- kr. um timan, kann

metast, at tær samlaðu útreiðslurnar um tíman verða 100,- kr. Tá er íroknað løn ella viðurlag til leiðararnar og møguligar flutningsútreiðslur bæði til lærararnar og til næmingarnar í teimum førum, har fritíðarundirvísingin má miðsavnast á einum stað. Hetta seinasta ger seg galdandi m.a. á Sandoyar Miðnámsskúla og Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Læraraløgnin er roknað sum miðalløn millum ein lærara á 1. stigi og ein á seinasta stigi tann 1. oktober, rundað til heilar krónur.

Verulig nýtsluamboð eiga luttakararnir sjálvir at gjalda, men í ein ávísan mun kann tørvur vera á amboðum til lærararnar og á serligum undirvísingartilfari, sum bert kann verða brúkt til fritíðarundirvísingina.

Vanliga standast ongar útreiðslur av hølum, av tí at teir almennu myndugleikarnir skulu hava tey ókeypis tøk til undirvísingina.

Arbeiðisbólkurin hevur, sum áður nevnt, skotið upp 50% sum endurgjaldsprosent. Hetta endurgjaldið er eitt sindur minni enn tað, kommunurnar higartil fáa fyri kvøldskúlaundirvísing.

Tað viðurlag, sum arbeiðisbólkurin heldur, at luttakararnir sjálvir eiga at gjalda, er ikki talt við upp í endurgjaldsmetingina, sum bert er grundað á tær góðkendu bruttoútreiðslurnar.

Siga vit, at lisnir verða 25.000 tímar árliga, at útreiðslurnar til hvønn tíma vera 100,- kr. til hvørt skeiðið, verða tær samlaðu útreiðslurnar upp á 2.500.000 kr. býttar sundur við 1.250.000 kr. á landskassan, 500.000 kr. á kommunurnar og 750.000 kr. á luttakararnar. Spurningurin um ríkiskassans studning til landskassan verður viðgjørdur niðanfyri.

b. Serstøk fritíðarundirvísing eftir 3. tátti

Teir møguleikar, sum arbeiðisbólkurin hevur havt til tess at meta um tørv og møguleikar at fremja slíka undirvísing, sum her er talan um, eru bygdir á eitt sera leysligt grundarlag. Mett verður, at í teimum fyrstu árum verður gjørligt at fremja serstaka fritíðarundirvísing, ið samsvarar við 5.000 læraratímar. Mett verður, at útreiðslurnar til hesar tímar verða eisini 100,- kr. um tíman. Henda útreiðsla fevnir bert um læraraløn, sum í einstøkum førum verður hægri enn vanlig løn fyri fritíðarundirvísing, og møguligar flutningsútreiðslur. Mett verður, at leiðaraløn ella viðurlag kemur undir almenna fritíðarundirvísing.

Sum ávíst í rammulógini, skal hetta slagið av undirvísing vera ókeypis. Hetta er tí ásett í § 19, 2. stk. í lógaruppskotinum.

Arbeiðisbólkurin hevur tá áskoðan, soleiðis sum tað er komið til orðanna í § 5 í reglunum, at landsins myndugleiki, landsskúlaráðið, eigur at sjónta hesum slagi av fritíðarundirvísing á ein slíkan hátt, at hon lýkur tann neyðuga tørv í mest møguligan mun, og at teir avmarkaðu miðlar verða nýttir sum best.

Henda umrøddu undirvísing fer vanliga fram á ymsum undirvísingarstovnum, sum eru figgjaðir ógvuliga ymist.

Viðvikjandi royndum fólkaskúlans skal serstakliga viðmerkjast, at tær útreiðslur, sum standast av serstakari fritíðarundirvising til slíkar royndir, eru at kalla bert lønarútreiðslur. Sum kunnugt rinda kommunurnar einki av lønum fólkaskúlans.

Arbeiðisbólkurin hevur av hesum umstøðum ta áskoðan, at kommunurnar — í ti vavi tær skulu reka undirvisingina — skulu fáa fult endurgjald úr landskassanum fyri útreiðslurnar.

Við støði í omman fyri nevndu ætlan um tímatalið verða útreiðslurnar til serstaka fritíðarundirvising mettar til 500.000,- kr.

c. Fritíðarvirksemi

Samhært § 7 í rammulógini skulu børnum og ungfólki verða tryggjað eitt fjølbroytt tilboð um fritíðarvirksemi í einum vavi, sum hóskandi er viðurskiftunum. Tað skal standa øllum børnum og ungfólki, sum eru yngri enn 25 ár, í boði.

Hesin partur av íbúgvum landsins fevnir um 20.000 fólk, men tó heldur arbeiðsbólkurin, at tað møguliga luttakaratalið vanliga verður millum fólk í aldursbólkinum 10 - 25 ár ella ialt 12.000 fólk. Bólkurin 10 - 14 ár fer í stóran mun at verða vardur av teirri undirvising í fritíðini, sum veitast kann næmingunum eftir teirri nýggju fólkaskúlalógini. Hetta er eisini galdandi, men kortini í minni mun, teimum fylgjandi árgangum, ið samsvara við 8. - 10. árgang í fólkaskúlanum. Men hin vegin eigur eisini í hesum viðfangi at nevnast, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar á 10 ára aldri og meira, sum eru virknir luttakarar í ítróttafeløgunum, eins og flestu skótar eisini eru úr hesum bólki.

Av teimum upplýsingum, sum eru til taks, um virknar luttakarar í kóri og orkestrum, í skótaarbeiði og ítróttafeløgum, verður mett — tá ið vit taka tann partin av íbúgvunum uppí, sum iðka ítrótt uttan tó at vera beinleiðis limir í einum ítróttafelag — at tað eru um leið 7.000, sum luttaka í hesum virkseminum. Meginparturin av teimum, sum luttaka í kórum, orkestrum, og sum iðka ítrótt uttan um ítróttafeløgini, er meira enn 25 ár, meðan meginparturin av skótum og virknum limum í ítróttafeløgum er undir 25 ár. Samanumtikið meta vit, at 5.000 av teimum fyrr nevndu 7.000 virknu luttakarunum eru undir 25 ár.

Arbeiðsbólkurin metir, at við tí núverandi íbúgvamynstri verður tað bert gjørligt í einstøkum førum at hava eitt serstakt fritíðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár og eitt annað fyri fólk, sum eru eldri enn 25 ár.

Av hesi orsøk hevur arbeiðsbólkurin gjørt møguleikar fyri í lógaruppskotinum, at fólk yvir 25 ár kunnu luttaka í fritíðarvirksemi fyri fólk undir 25 ár, at ein kommuna eisini kann veita fólkum yvir 25 ár stuðning, og at ein kommuna kann góðkenna fritíðarvirksemi bert fyri fólk, sum eru eldri enn 25 ár.

Í sambandi við uppsetingina av teimum fíggjarligu útroknингunum hevur arbeiðsbólkurin nýtt sum grundarlag eina stuðningsheimilaða útreiðslu um tíman (í ti vavi tímar kunnu roknast) upp á 50 kr. ella helvtina av útreiðslunum til almenna og serstaka fritíðarundirvising. Í hesi avmarking er ikki tann avmarking, sum t.d. eitt

kór ella orkestur kann geva einum instruktøri í løn, men bert avmarkingin í teimum studningsheimilaðu útreiðslunum.

Við støði í tí virksemi, sum higartil hevur verið á hesum øki og tí møguliga stóra tørvi, má haldast, at hesin tørvurin kann metast til 50.000 tímar árliga. Henda útreiðsla verður sostatt ialt 2.500.000,- kr., harav luttakararnir sjálvir minst eiga at gjalda 500.000,- kr., landskassin 1.250.000 kr. og kommunurnar 750.000 kr.

d. Fíggjarligar avleiðingar annars

Sambært 5. tátti í lógaruppskotinum skulu teir almennu myndugleikarnir hava høgi v.m. ókeypis tøk til fritíðarundirvising v.m. eftir hesi lóg. Tann myndugleiki, sum eigur viðkomandi høli v.m. skal rinda útreiðslurnar. Mett verður, at í tann mun, virksemini eftir hesi lóg verða størri, enn tey fyrr hava verið, verða útreiðslurnar til høli v.m. eisini at hækka eitt sindur. Hesar útreiðslur fara fyrst og fremst at koma á kommunurnar sjálvar.

Sambært 1. tátti kann landsskúlaráðið veita studning til luttøku lærara og leiðara í útbúgvingarskeiðum, eins og tað sjálvt kann halda skeið. Áður hevur hetta ikki verið gjørligt, men í ein ávísan mun hevur tann heimild, sum skúlastjórnin hevur at veita studning til læraranna eftir útbúgving v.m., verið nýtt. Tær øktu útreiðslurnar fara neyvan at vaksa í størri mun.

Sum áður nevnt, kunnu 30% veitast í studningi til ítróttapláss, sum part úr skúlabyggigrunninum og sum part úr ítróttagrunninum, og harafturat verða 20% veitt í ríkisstudningi. Aftur at hesum kann landskassin veita 40% í studningi til ungdómshús.

Ætlanin er, at lán skal kunna veitast úr tí grunni, sum er umrøddur í § 24, í tann mun, har hesir møguleikar rokka ov stutt ella ikki kunnu brúkast.

Umframt tær í lógini ásettu tilskrivingar, rentur og avdráttir av umrøddu lánum, so heldur arbeiðsbólkurin, at m.a. lánigrunnurin til ítróttaendamál og ítrótta- og skúlabyggigrunnurin eiga heilt ella lutvíst at koma upp í grunnin.

Við støði í teimum oman fyri nevndu metingum um útreiðslur til reglurnar eftir 2. — 4. tátti verða tær árligu veitingarnar eftir § 23, 2. stk. 275.000 kr.

e. Ríkisstudningur til fritíðarundirvising v.m.

Sum ávist í álitinum viðvikjandi rammulógunum, so er fyritreytin tann, at tær galdandi studningsreglur verða varðveittar. Hetta ber við sær, at kommununum framvegis verða veitt 46 2/3% í ríkisstudningi av tímagjaldinum eftir teimum stevnumiðum, sum nevnd eru í § 14 í lógarkunngerð nr. 257, dagsett 14. juni 1960, sbr. viðmerking til § 20.3.31.51.06 á fíggjarlógini. Ríkisstudningurin er dupult so stórur sum landskassastudningurin.

Eftir teimum núgaldandi reglum eru møguleikarnir at fremja serstaka fritíðarundirvising og serstakliga fritíðarvirksemi vorðnir avmarkaðir av teimum undir-

vísingatevnum, sum nevnd eru í teimum galdandi reglum. Fremjanin av teimum nyggju reglunum í lógaruppskotinum fara at stímbra um áhugan fyri teimum í 3. og 4. tátti nevndu tiltøkum.

Rammulógin áleggur kommununum eina skyldu at tryggja íbúgvunum eitt fjølbroytt tilboð innan serstaka fritíðarundirvísing eftir 3. tátti og fritíðarvirksemi eftir 4. tátti fyri børn og ungfólk undir 25 ár. Henda skylda ber eftir arbeiðsbólksins uppfatan við sær, at ríkisstuðningur eigur at verða veittur til hetta.

Tann núgaldandi endurgjaldsskipan kann í høvuðsdráttum verða varðveitt í viðurskiftunum millum landskassan og ríkiskassan, men hetta fer kortini at volda ávísar trupulleikar fyrisitingarliga. Hugsandi um eina smidliga og hóskandi skipan av fritíðarundirvísingini v.m., heldur arbeiðsbólkurin, at í viðurskiftunum millum kommunurnar og landskassan (landsskúlaráðið) er neyðugt at nýta ta stuðningsskipan, sum skotin er upp í lógaruppskotinum, sjálvt um hildið verður neyðugt at varðveita tann háttin fyri ríkisstuðningi, sum áður hevur verið nýttur.

Tó heldur arbeiðsbólkurin tað ikki vera rímiligt ella hóskandi, at ríkisstuðningurin til almenna fritíðarundirvísing framvegis skal verða dupult so stórur sum landskassans stuðningur, treytað av, at ríkisstuðningur verður veittur til tey í 3. og 4. tátti nevndu tiltøk. Undir hesum viðurskiftum heldur arbeiðsbólkurin, at landskassin eigur at fáa 50% í stuðningi úr ríkiskassanum av landskassans útreiðslum. Hetta er ein býtisháttur, sum er vanligur á mongum økjum. Arbeiðsbólkurin heldur, at tá talan er um stuðning til bygningar v.m., eiga tær enn galdandi reglur og siðvenjur framvegis at verða varðveittar.

Spurningurin um framhaldandi ríkisstuðning eigur at verða greiddur við avtalu millum ríkið og heimastýrið.

f. Samandráttur

Havandi í huga tær fyrr nevndu fortreytir v.m., ber til at seta upp fylgjandi yvirlit yvir tær væntaðu útreiðslurnar til tiltøkini eftir hesum lógaruppskoti, uttan at vit tó hava íroknað stuðning til nýgerð ella lán eftir § 23 í uppskotinum.

Í 1000 kr.

Slag	Privatu	Kommunurnar	Landið	Ríkið	Ialt
Almenn fritíðarundirvising eftir 2. tátti	750	500	625	625	2.500
Serstøk fritíðarundirvising eftir 3. tátti.	—	—	250	250	500
Fritíðarvirksemi eftir 4. tátti. 1)	500	750	625	625	2.500
Grunnveitingar (§ 24)	—	—	137,5	137,5	275
Ialt	1.250	1.250	1.637,5	1.637,5	5.775

1) Viðmerkjast skal, at hetta er minsta upphæddin, av ti at fritíðarvirksemið fer fyri ein part væntandi at verða dýrari enn tann góðkenda studningsheimilaða figgjarætlan, og at tað fyri ein part í sjálvum sær krevur so fáar figgjarligar tiltaksveitingar, at studningur ikki eigur at verða veittur av ti almenna.

Uni so er, at tær reglur um rikisstudning, sum higartil hava verið galdandi, verða varðveittar, heldur arbeiðsbólkurin, at tað kann haldast at vera ráðiligt at meta, at rikisstudningur svarandi til 35.000 timar kann verða veittur. Við eini leraraløn upp á 86 kr. og einum studningi upp á 46 2/3% gevur hetta ein samlaðan rikisstudning, ið svarar til stivliga 1,4 mill. kr. ella góðar 200.000 kr. minni enn í oman fyri nevnda uppskoti. Landskassans útreiðslur fara at vaksa samsvarandi.

Í niðanfyri nevnda yvirliti eru útreiðslurnar til kvøldskúlarnar í Føroyum í árunum 1972/73 - 1977/78 og tær ætlaðu útreiðslurnar fyri 1978/79 settar upp.

Í 1000 kr.

Ár	Privatu [1]	Kommunurnar	Landið	Ríkið	Ialt [2]
1972/73	110	131	110	196	500
1973/74	100	203	182	291	750
1974/75	110	164	70	315	650
1975/76	170	307	239	478	1.200
1976/77	200	481	374	748	1.800
1977/78	230	634	504	976	2.300
1978/79 (ætl)	250	765	595	1.190	2.800

1) Tær privatu útreiðslurnar eru mertar við støði í luttakaratalinum og 50 kr. í undirvisingargjaldi.
2) Upphæddirnar, sum standa í hesum teigi, eru avrundaðar, av tí at — aftur at teimum veruligu útreiðslunum — koma eisini upp í henda teigin tær ætlaðu útreiðslurnar.

Á løgtingsins fíggjarlóg í fíggjarárinum 1979/80 er sett ein peningaupphædd á § 14 konto nr. 2260 — kvøldskúlar upp á 583.000 kr. Harumframt eru settar á § 14 konto nr. 3112 — Studningur til ÍSF 742.000 kr. og konto nr. 2389 — Tónleikur og sangur 200.000 kr. Arbeiðsbólkurin metir, at í framtíðini fara ið hvussu er partar av teimum báðum síðst nevndu konti at verða nýttir til tiltøk eftir hesi lóg. Tað er heldur ikki óhugsandi, at tað eru útreiðslur á øðrum konti, sum í framtíðini eiga at koma undir hesa lóg. Hóast hesi viðurskifti metir arbeiðsbólkurin, at landskassans útreiðslur til tess at fremja tiltøkini eftir hesum lógaruppskoti krevja øktar peningajáttanir. Harafturímóti kann sigast, at verður lógaruppskotið fram eftir tess ætlan, so fer tað at roynast sum ein hjálpandi hond at loysa teir ymsu trupulleikar m.a. á bygdunum og hjá ungfólkinum um alt landið.

Arbeiðsbólkurin hevur framumanfyri mett um tað væntaða virksemið, um so er, at lógaruppskotið verður sett í verk. Hugsa vit okkum, at virksemið bert verður til helvtar av tí, vit mettu, so verða tær samlaðu útreiðslurnar slakar 2,9 mill. kr. Hetta samsvarar yvirhøvur við tær ætlaðu útreiðslurnar bert til kvøldskúlan í fíggjarárinum 1978/79. Aftur at hesum koma tær útreiðslur, sum t.d. eru goldnar til itrón o.a.t., og sum eftir lógaruppskotinum ætlast at vera veittar gjøgnum hetta í framtíðini.

Áður er nevnt, at landsskúlaráðið kann áseta lágmark og hámark fyri frítíðarundirvising v.m. eftir lógaruppskotinum. Teir játtandi myndugleikar kunnu á sama hátt við at áseta støddina á konto-upphæddini avmarka virksemini eftir lógini. Bæði

landsskúlaráðið og teir játtandi myndugleikar eru tó í ein vissan mun bundnir av reglunum í §§ 2 og 7 í rammulógini, har tað er ásett, at myndugleikarnir skulu tryggja, at íbúgvarnir í kommununi fáa eitt fjølbroytt tilboð um fritíðarundirvising v.m. í einum vavi, sum hóskandi er til viðurskiftini.

Orðið hóskandi ber í sjálvum sær reiðiliga stóran møguleika fyri tulking.

Viðmerkingar til tær einstøku reglurnar

Til 1. tátt. Fritíðarundirvisingarinnar hugtak

Til § 1

Reglan ásetur almennt, hvat ið fritíðarundirvising v.m. er, og nevnir heimildina hjá lógini.

Til 2. tátt. Almenn fritíðarundirvísing

Til § 2

Reglurnar í 1. stk. siga, hvat ið tann almenna fritíðarundirvisingin er.

Í 2. stk. verður ásett, at landsstýrið kann gera almennar reglur um almenna fritíðarundirvising.

Í 3. stk. stendur heimildin hjá landsskúlaráðnum at góðkenna avmarkingar í undirvisingarevnunum, eins og tað kann góðkenna reglur um innihaldið, og hvussu lagt skal vera til rættis. Her snýr tað seg um faklig og pedagogisk viðurskifti, har rættindini einans liggja hjá landsskúlaráðnum, sum fremur tey gjøgnum skúlafyrisitingina.

Til § 7

Reglan heimilar beinleiðis, at undirvísarar á øðrum undirvísingarstovnum kunnu lata undirvísing eftir hesum átti koma upp í teirra skylduga tímatal.

Til § 8

Reglan ásetur, at næmingar í fólkaskúlanum ella á øðrum undirvísingarstovnum kunnu bert luttaka í serstakari fritíðarundirvísing av ti slagi, sum nevnt er í § 5, við loyvi frá skúlafyrisitingini.

Hetta er gjørt við tí í huga, at næmingar ikki eiga at kunna — uttan í heilt serstøkum førum — fáa sama dag undirvísing á tveir ymiskar hættir.

Til 4. tátt. Fritíðarundirvísing

Vist verður til tær almennu viðmerkingarnar í II, broti C.

Til § 9

Reglan ásetur, at ein kommuna hevur skyldur at ansa eftir, at tað verður tryggjað børnum og ungfólki undir 25 ár eitt fjølbroytt tilboð um fritíðarvirksemi í einum vavi, sum hóskandi er viðurskiftunum í kommununi. Hetta samsvarar við §§ 7-8 í rammulógini.

Tilboðið kann eins væl vera beinleiðis fyriskipað av kommununi sum av privatum fyritakssemi.

Á sama hátt sum viðvíkjandi almennari fritíðarundirvising kann landsstýrið áseta almenna reglur um fritíðarvirksemi, meðan landsskúlaráðið góðkennir sjálvt innihaldið, og tað góðkennir somuleiðis nærri reglur um, hvussu kommununar skulu veita studning til fritíðarvirksemi.

Til § 10

Reglan gevur eini kommunu møguleika at góðkenna, at fólk yvir 25 ár kunnu luttaka í fritíðarvirksemi fyri børn og ungfólk undir 25 ár.

Í 2. stk. er ásett, at ein kommuna kann góðkenna fritíðarvirksemi bert hjá fólki, sum er yvir 25 ár. Góðkenningin eftir 1. og 2. stk. kann fara fram bæði uttan og við studningi, tá talan er um fólk yvir 25 ár.

Tær nærri reglur um góðkenning, slagið og innihaldið í fritíðarvirkseminum eftir hesi grein og reglurnar um studning verða ásettar á sama hátt sum fritíðarvirksemið fyri børn og ungfólk undir 25 ár eftir § 9.

Til § 11

Reglan sigur treytirnar til tess at góðkenna fritíðarvirksemi. Av tí at virksemisslagini eftir hesum táttí kunnu vera ógvuliga skiftandi, og av tí at tørvur kann vera á at deila aldursbólkarnar, um so er, at viðurskiftini benda tann vegin, so er í 2. stk. ein regla, eftir hvørjum landsskúlaráðið kann loyva frávikum frá teimum almennu treytunum.

Til 5. tátt. Høli v.m.

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar omman fyri í II. broti d.

Til 6. tátt. Fyrisitingarligar reglur

Víst verður til tær almennu viðmerkingarnar omman fyri í II. broti e.

Til § 13

Reglan í 1. stk. samsvarar við § 17 í stýrislógini.

Til § 14

Sambært stýrislógini, sbr. § 13 í hesi lóg, hevur bygdarráðið skyldu at tryggja, at tað verður givið íbúgvunum eitt hóskandi tilboð av fritíðarundirvísing v.m., eins og tað

skal hava teir neyðugu miðlar til taks. Harafturímóti hevur skúlanevndin ta pedagogisku og innihaldsligu ábyrgd av fritíðarundirvisingini v.m., í tí vavi, hon heldur seg innanfyri tær figgjarligu rammur, sum bygdarráðið hevur ásett fyri fyriskipanunum eftir lógaruppskotinum.

Til § 17

Í regluni standa tær serstøku uppgávur, sum landsskúlaráðið skal hava um hendi umframt tær umsjónarligu.

Sambært 1. stk. góðkennir landsskúlaráðið setanarkorini, heruppi í lønirnar hjá lærarum og leiðarum v.m.

Sambært 2. stk. skal landsskúlaráðið tryggja ta neyðugu samskipan millum tær ymsu kommununar. Í roynd og veru kann væntast, at landsskúlaráðið góðkennir almenn stevnumið fyri samskipanini, og skúlafyrisitingin tekur avgerð í teimum einstøku førunum.

Reglan í 3. stk. heimilar landsskúlaráðnum sjálvt at fremja landsumfatandi fritíðarundirvising v.m.

Umsiður stendur í 4. stk. ein regla um, at landsskúlaráðið skal gera eina útbyggingarætlan fyri fyriskipanirnar eftir lógaruppskotinum.

Til 7. tátt. Studningsreglur v.m.

Vist verður til tær almennu viðmerkingarnar í II. broti f.

Til 8. tátt. Aðrar reglur

Vist verður til tær almennu viðmerkingarnar í II. broti g.

Til 9. tátt. Gildisreglan

Arbeiðisbólkurin hevur mett, at henda lóg kann kunngerast innan 1. august 1979.

SKJAL 19 B

Lov nr. 53 af 14. februar 1979

Lov for Færøerne om fritidsundervisning m.v.

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning,
gør vitterligt:
Folketinget har vedtaget og Vi ved Vort samtykke stadfæstet følgende lov:

§ 1. Fritidsundervisning m.v. er undervisning og virksomhed tilbudt efter denne lov og efter de bestemmelser, der fastsættes af Færøernes hjemmestyre i henhold til § 9.

§ 2. Den lokale skolemyndighed skal drage omsorg for, at der af det offentlige sikres beboerne i den eller de kommuner, som skolemyndigheden omfatter, et alsidigt tilbud om undervisning i emner, hvori befolkningen over 14 år måtte ønske undervisning i fritiden, i et efter forholdene rimeligt omfang.

§ 3. Fritidsundervisningen skal stå åben for alle over 14 år.

§ 4. Lærerne skal have de fornødne kvalifikationer for at undervise i det pågældende emne.

§ 5. Den lokale skolemyndighed har pligt til at sikre befolkningen over 14 år et alsidigt tilbud om undervisning omfattende:

1) prøveforberedende enkeltfagsundervisning m.v.
2) erhvervsmæssig undervisning og
3) specialundervisning omfattende såvel undervisning, der tager sigte på at afhjælpe eller begrænse virkningerne af et handicap (kompenserende specialundervisning), som undervisning, der er tilrettelagt under hensyntagen til deltagerens handicap (hensyntagende special undervisning).

§ 6. Undervisningen i henhold til § 5 skal være vederlagsfri.

Stk. 2. Lærerne skal have de fornødne kvalifikationer til undervisning i det pågældende emne.

§ 7. Den lokale skolemyndighed skal sikre, at der ved det offentliges foranstaltning gives børn og unge et alsidigt tilbud om fritidsvirksomhed i et efter forholdene rimeligt omfang.

§ 8. Fritidsvirksomheden skal være tilrettelagt og stå åben for alle børn og unge under 25 år efter generelle kriterier.

§ 9. Færøernes hjemmestyre fastsætter de nærmere regler om fritidsundervisning m.v., herunder om undervisningens styrelse, indhold, omfang og tilrettelæggelse.

§ 10. Lovens ikrafttrædelsestidspunkt fastsættes af undervisningsministeren efter forhandling med Færøernes hjemmestyre.

Givet på Christiansborg slot, den 14. februar 1979

Under Vor Kongelige Hånd og Segl

MARGRETHE R

/Dorte Bennedsen

Undervisningsmin. I. afd. j. nr. 1978-1102-5

Yvirlit

yvir fak/evnir, ið undirvist hevur verið í á kvøldskúlum veturin 1980/81.

alisfrøði
bílætveving
blásiinstrumem
blokfloyta
bókbinding
bókhald
cellospæl
danskt
drama
dugnaskapsskeið í sigling
elektronikk
enskt
evnafrøði
fimleikur
fingramát
fiólspæl
fotolæra
fólkadansur
franskt
frosking
føðifyrireiking
føroyskt
guitarspæl
harmonikuspæl
heimaskiparaskeið
hondarbeiði
islendskt
klaver
knýting
látin
maskinskriving
matgerð
metalsmið
motorlæra
perluseyming
postalinsmáling
rammuveving
restaurering av gomlum møblum
rokning
russiskt
seyming
saxofonspæl
sjómanskapur
skattakunning
snarskrivt
spanskt
stoffprent
støddfrøði
svimjing
tekning
tilevning
trolarbeiði
træsmíð
tvørfloyta
týskt
ullarbeiði
urguspæl
veving
ættargransking
sangur
klarinettspæl

SKJAL 4

SKJAL 19 D

FØROYA KOMMUNUFELAG
F.K.F.
Telefon 44 343

Post box 73
3850 Glyvrar
Tlf. 47600

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

12. mars 1982

Viðv.: Løgtingslóg um fritíðarundirvising v.m.

Heildarmyndin av uppskotinum er, at fritíðarundirvising og annað fritíðarvirksemi er eitt kommunalt mál undir eftirliti av landsskúlaráðnum/fyrisitingini. Tó er tað soleiðis, at myndugleikarnir hava ikki rættuliga álit á, at kommunurnar fara at gera sum landsskúlaráðið/fyrisitingin heldur vera hóskandi, tí er tað eitt gjøgnumgangandi lag í lógini, at um kommunurnar ikki gera eftir ætlan landsskúlaráðsins/fyrisitingarnar, so hevur landsskúlaráðið/fyrisitingin heimild at seta í verk fyri tær, tí lógin hevur til endamáls, at allir borgarar skulu hava eitt hóskandi tilboð um fritíðarundirvising/virksemi. Landsskúlafyrisitingin/ráðið ger altíð av hvat, ið er hóskandi, fyri ta einstøku kommununa.

Ein slík skipan, har avgerðarrætturin hjá tí einstøku kommununi verður so álvarsliga skerdur, meðan skyldan at gjalda gongur móti tí ókenda — eina tilíka skipan tora vit ikki at mæla til, fyrr enn kommunurnar hava viðgjørt hana gjøllari. Hetta munnu fáar enn hava gjørt, men skulu vit — um tit loyva okkum eitt sindur av tíð — skipa fyri at kommunurnar kanna uppskotið og lýsa áskoðan sína.

Støða starvsnevndarinnar er í heilt stuttum tann: Ein fyrisiting eigur ikki at kunna áleggja einum fólkavaldum ráði skyldur. Uppskotið útholar kommunala sjálvstýri, og tí mælir starvsnevndin frá at leggja uppskotið fram í núverandi líki.

s.v.

Jens Dalsgaard, skr

15. mrs. 1982
F.L.j. nr. 2116-8[12]

SKJAL 5

SKJAL 19 E

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
kk/th

Tórshavn, tann 15. mars 1982

J. nr. 28/4. 1980

Føroya landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn

Tórshavnar býráð hevur tann 24. februar 1982 móttikið skriv landsstýrisins, dagfest 22. februar 1982, við uppskoti til løgtingslóg um fritiðarundirvising v.m., og har býráðið verður biðið um skjótast gjørligt og áðrenn 15. mars 1982 at senda landsstýrinum ummæli býráðsins av uppskotinum.

Sagt verður við hesum frá, at tað hevur ikki vist seg gjørligt hjá býráðnum at viðgera uppskotið nóg gjølla, og býráðið er í iva um, hvørjar endaligu ætlanirnar eru við lógaruppskotinum.

Sum landsstýrinum kunnugt hevur Tórshavnar kommuna eins og aðrar kommunur í Føroyum roynt aktivt at fáa eina kvøld- og ungdómsskúlaskipan at virka á tí støði, ið kvøldskúlalógin frá 7. oktober 1935 gevur.

Trupult hevur tað vist seg at fáa nóg greiðar reglur frá skúlastjórnini, men við góðari samvinnu millum skúlastjórnina og kommununa hevur tað kortini eydnast at uppbygt eina kvøldskúlaskipan, ið kommunan hevur birt uppundir og stuðlað.

Lógaruppskotið er ikki orðað í tráð við hesa positivu samvinnu, men tykist í størri mun at áleggja kommununum krøv, uttan at kommunurnar hava nakra ávirkan.

Sjálvt um tað tykist, at landsstýrið ikki kennir figgjarligu fylgjurnar av lógaruppskotinum, so er tó greitt, at uppskotið leggur upp til væl størri útreiðslur fyri kommunukassan, enn kommunan í dag hevur við núverandi skipan.

Býráðið kann tí sum er als ikki viðmæla uppskotið, men krevur, áðrenn viðari viðgerð fer fram av tí, at endaligu ætlanirnar við uppskotinum verða betri lýstar eins og tær figgjarligu fylgjurnar fyri kommununa.

Tað ørkymlar eisini kommununa, at hetta longu er 3. mál, ið núsitandi landsstýri leggur fram, har kommunala sjálvstýri verður skert.

Býráðið heldur hin vegin, at tað er rætt at fáa viðgjørt og endurskoðað gomlu kvøldskúlalógina, og hvussu hon hevur virkað, og skjýtur upp, at kommunurnar á einum dagsfundi fáa nærri frágreiðing frá landsskúlaráðnum, landsskúlafyrisitingini og landsstýrinum um hesi viðurskifti og tá fáa høvi at seta fram spurningar og viðmerkingar.


Eftir slikan fund kundu kommunurnar lættari givið eitt ummæli, ið løgtingsviðgerð kundi nýtt.

B.v.
Poul Michelsen

15. mrs. 1982
F.L.j. nr. 2116-8[13]

/Kjartan Kristiansen
form. skr.

RED: 10 X



Nasjonalbibliote

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 1

